



RI



Na

Telephone: +47

LØGTINGS
TIDINDI

1986

LØGTINGSTÍÐINDI 1986

Løgtingstíðindi

1986

Bind A

Løgtingsmál

TÓRSHAVN 1990

Løgtingstíðindi 1986.
© Føroya Løgting.
Lagt til rættis: Esther Berth.
Fotosatsur, umbrótur: P/F Blaðstarv.
Prent: Havnar Prent.
Heftur: Bókavirkið.

Løgtingsmál í nummarrøð

		Bls.
	Ólavsøkutingið 1986	3
	Frágreiðing frá løgmanni	8
	Eykatingseta	22
	Farloyvi	22
	Tingnevndir	24
1	Rættargangslógin (70/86)	29
2	Val av álitsmonnum og nevndum	37
3	Broytingar í borgarligu revsilógini (76/1985)	38
4	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um idnaðargrunn	41
5	Fíggjarløgtingslóg 1987	43
6-1	Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroya Yvirformyndari	104
6-2	Grannskoðan av almennum roknskapum — Postverk Føroya	108
6-4	Grannskoðan av almennum roknskapum — Mentanargrunnur Føroya Løgtings	108
6-4	Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroya Skúlabókagrunnur	109
6-5	Grannskoðan av almennum roknskapum — Brandvenjingarstøðin við Áir	110
6-6	Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroyskur Happadráttur	111
6-7	Grannskoðan av almennum roknskapum — Sjónvarp Føroya	112
6-8	Grannskoðan av almennum roknskapum — Útvarp Føroya	114
6-9	Grannskoðan av almennum roknskapum — Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna	116
6-10	Grannskoðan av almennum roknskapum — Húsalánsgrunnurin, Íbúðagrunnurin, Bjálvingargrunnurin	118
6-11	Grannskoðan av almennum roknskapum Føroya Jarðargrunnur	119
6-12	Grannskoðan av almennum roknskapum — Sjónvarp Føroya	120
6-13	Grannskoðan av almennum roknskapum — Telefonverk Føroya Løgtings	123
6-14	Grannskoðan av almennum roknskapum — M/t »Nónhamar«	126
6-15	Grannskoðan av almennum roknskapum — Postverk Føroya	127
6-16	Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroya landskassi	128
6-17	Grannskoðan av almennum roknskapum — Tjaldurs Apotekið	131

7	Løgtingslóg um eydnuspæl v.m.	133
8	Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri idnað, handverk og tænastufyritøkur	145
9	Skrásetingargjald á akførum	147
10	Broyting í serliga innflutningsgjaldinum	169
11	Broyting í innflutningsgjøldum	177
12	Broyting í eykainnflutningsgjaldinum	182
13	Serligt gjald á brenniolju v.m.	185
14	Gjald av ferðaseðlum	197
15	Gjald av útleigan av sjónbondum	198
16	Broyting í vektgjøldum	199
17	Broyting í lóg um áseting av skatti til landskassan	203
18	Broyting í løgtingslóg um hjálvingarstuðul til pensjónistar	205
19	Avtøka av løgtingslóg um býti av rakstaravlopi landskassans	207
20	Løgtingslóg um eykajáttan til Ráfiskagrunnin	210
21	Uppsk. til samt. viðv. flogvallaviðurskiftunum	213
22	Avtøka av serligum gjaldi á brenniolju v.m.	215
23	Lækkan av eykainnflutningsgjaldinum	216
24	Bundin uppsparing	217
25	Løgtingslóg um brennistudn. til ávísar pensjónistar	224
26	Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna	228
27	Fiskiloyvi til »Háborg«	229
28	Løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum	230
29	Landsstýrismál	241
30	Broyting í konkurslógini	243
31	Lóg um føroyskt lóggávuvald og stýrisskipan innan danska kongaríkið (heimastýrisskipan)	246
32	Keyp av húsaognum	251
33	Atgongd hjá fremmandum herskipum og hernaðarflogførum til danskt øki í friðartíð	254
34	Sáttmáli ímillum Føroya landsstýri og ríkisstjórnina í kongaríkinum Danmark øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska Tjóveldinum hinumegin um sínamillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið hinumegin um sínamillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið	258
35	Bann móti handli við Suðurafrika og Namibia	258
36	Broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna	260
37	Broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd	263
38	Uppskot til løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað	266

39	Lóg um viðgerðarhjálparar (terapiassistentar)	274
40	Broyting í lógunum um sjúkrasystrar	275
41	Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir	277
42	Broyting í læknalógini	279
43	Broyting í filmseftirlitslógini	281
44	Sáttmáli um vernd av forðandi villini djórasløgum (Bonn-sáttmálin)	283
45	Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn veiðimannna	284
46	Uppskot til løgtingslóg um menningarhjálp	298
47	Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya	301
48	Ríkislóg um avtøku av millumlandarættindum um konossement	318
49	Lán til keyp av húsum til Landmiðstøð fyri undirvísingarambað	320
50	Norðurlendskur sáttmáli um vinnuútvinnan fyri ávísar starvsbólkar innan heilsuverkið og djóralæknafrøðiverkið	324
51	Broyting í løgtingslóg um býti av rakstraravlopi landskassans	325
52	Ferðafólka- og farmafar til Mykinessiglingina	327
53	Broyting í løglingsvallógini	329
54	Keyp av húsaognum (landslæknahúsini)	335
55	Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir	336
56	ST-sáttmáli um gíslatøkur	339
57	Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi 1987	340
58	Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi 1987	346
59	Skipan millum Føroyar og EEC um sínamillum fiskirættindi 1987	349
60	Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1987	352
61	Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1987	354
62	Broyting í løgtingslóg um studning til fiskivinnuna	356
63	Avtøka av løgtingslóg um studning til veiðu av fiskaðarfiski	359
64	Leinging av flogvøllinum í Vágum	360
65	Borgan fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu	362
66	Millumlanda reglur um útinnan av revsing v.m.	363
67	Ábøtur á vegastrekkið Kollafjørður/Hósvík	365
68	Viðvíkjandi eykamanning til ferðslupolitiið	367
69	Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og skamtanarskipanini	369
70	Bygging av eystaru brimverju v.m. í Kirkjubø	370

71	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.	372
72	Avtøka av Vinnulánsgranni Føroya Løgtings	375
73	Eftirgeving av ella gjaldskipan f. skuld til landskassan	378
74	Útbygging av Sands havn	382
75	Útbygging av Skálavíkar havn	386
76	Heimildir og skyldur landsst. at keypa ognir við landskassaveðhaldi	391
77	Keyp av rognum	393
78	Broyting í løgtingslóg um menningargrunn (nevndarval)	395
79	Føroyskt mótmæli móti bygging av verki til endurútvinnan av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi	397
80	Loyvi til Tórshavnar kommunu til útbygging á Sundi	401
81	Løgtingslóg um endurgjald til fólkapensjónistar	403
82	Bygging av sjónvarpshúsi í Eysturoynni	405
83	Breiðkan av vegnum millum Strendur og Selatrað	409
84	Um útbyggjan av vegakervinum í Eysturoy	412
85	Flytan av umsitingini av tyrlutænastuni	414
86	Avtøka av útvarps- og sjónvarpsgjøldum	416
87	Demokratisk avgerð um brennistøðina um Lorvik	418
88	VHF-móttakari og -sendari á Eiðiskolli	424
89	Trygdartænasta Føroya	426
90	Fráveruviðbøtur til sjófólk	428
91	Telefonendurgjald til pensjónistar	429
92	Broyting í løgtingslóg um natúrfriðing	430
93	Løgtingslóg um oyggjamenningargrunn	433
94	Áheitan á ÍRF um at bíða við at byggja brennistøð	439
95	Broyting í toll- og avgjaldsregl. f. bilar v. ABS-bremsu	442
96	Løgtingslóg um dupultsporað berghol ímillum Ánirnar, Árnafjørð og Depli	444
97	Uppskot til samtyktar viðvíkjandi bergholi til Gásadals	448
98	Lóg um avtøku av lóg um Føroya Gjaldstovu	450
99	Broyting í tinglýsingarlógini	452
100	Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum	454
101	Endurgjald til familjur, ið vilja passa egin børn	457
102	Broyting í útvarpslógini	461
103	Løgtingslóg um aling av fiski v.m.	464
104	Lóg um mynstring	471
105	Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu	477
106	Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir	481
107	Endurgjald í sambandi við avtøku av furunkolosusmittaðum smolti	487

108	Um at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 47 frá 10. mars 1965 »Om fragtaftaler med international vejtransport m.v.« sum broytt við lóg nr. 645 frá 13. december 1978	490
109	Um at lýsa sáttmála um stovnan av Norðurlendska Menningargrunninum fyri úrnorður at galda í Føroyum	491
110	Um at seta í gildi í Føroyum Haagsáttmálan frá 2. oktober 1973 um viðurkenning og fremjing av avgerðum um undirhaldsskyldu	492
111	Um at seta í gildi í Føroyum §§ 2 og 3 í lóg nr. 326 frá 4. juni 1986 »Om ændring af adoptionsloven og indfødsretsloven«	493
112	Avtøka av lóg um býti av rakstrartavlopi landskassans	495
113	Um at lýsa SÞ-sáttmála frá 18. december 1979 um avtøku av øllum háttum av mismuni ímóti kvinnum at galda í Føroyum	498
114	Løgtingslóg um manning av skipum	499
115	Sjóvinnulóg	413
116	Vegir og leiðingar	537
117	Um at banna, at roykt verður á almennum støðum	549
118	Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna	552
119	Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág	555
120	Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving	557
121	Ókeypis koppseting ímóti barnasjúkum	560
122	Skattligur stuðul til sjálvfíggjan av útbúgving	561
123	Broytingar í skattalógum (landsskatt og kommunuskatt) (áset. av skatti til landsks., inntsk. av rentum, skatt av rentutryggingum, íløgugrunn, skattl. avskrivingar)	566
124	Ferðamannamiðstøðin	623
125	Landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur	623
126	Broyting í landsbankalógini	625
127	Løgtingslóg um íbúðagrunn	629
128	Løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku	641
129	Sjómannaløgtingslóg	647
130	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan	695
131	Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum	697
132	Løgtingslóg um eykaviðbót til ávísar avlamispensjónistar	700
133	Broyting í donsku stuðulsskipanini til heimastýrið	702
134	Løgtingslóg um barnastyrk	706
135	Landsstýrismál (52/85)	711
136	Løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuvirkið	715

137	Gjald fyri ferðing úr Føroyum	719
138	Uppskot til løgtingslóg um menningarstovu	721
139	Løgtingslóg um útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudning til ávísar pensjónistar	726
140	Val av álitsmonnum og nevndum (1987)	726
141	Veiting av ríkisborgararætti	726
142	Løgtingslóg um landsjørð (88/85)	728
143	Loysn av arbeiðsósemju	729
100-1	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um próstagarð á Nesi	736
100-2	Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, um studentaskúla og HF í Eysturoy	738
100-3	Fyrispurningur til løgmans um rikna fiskivinnupolitikk	741
100-4	Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, um útbýtið av avlopi av tipstænastuni í Føroyum	743
100-5	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um ætlan landsstýrisins í millumlanda flúgving	744
100-6	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um berghol til Gásadals	747
100-7	Fyrispurningur til løgmans um reglurnar um tænastuviðurskifti landsstýrismanna	748
100-8	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um elevator á »Dúgvuna«	749
100-9	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um flogvallamálið	751
100-10	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um vegagerð Funning-Funningsfjørð	753
100-11	Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, um tolllækking upp á eykaútgerð til bilar	756
100-12	Fyrispurningur til Lass Klein, landsstýrismann, um samferðsluviðurskiftini Svínoy/Kalsoy	757
100-13	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um siglingarrennu gjøgnum Haraldssund	759
100-14	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um siglingarrennu gjøgnum Haraldssund	762
100-15	Fyrispurningur til Niels P. Danielsen, landsstýrismann, um flytan og fyrisiting av lønjavningargrunninum	763
100-16	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um flutningssambandið um Vestmannasund	766
100-17	Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, um útbygging av Hotel Tórshavn	768

100-18 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um tunnil gjøgnum Kirkjubøreyn 770
100-19 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, um nýggja endurskoðan av lóggávuni um bygging 771

23	Lækkan av eykainnflutningsgjaldinum	216
24	Bundin uppsparing	217
51	Broyting í løgtingsl. um býti av rakstaravl. landsks.	325
73	Eftirgeving av ella gjaldskipan f. skuld til landskassan	378
112	Avtøka av lóg um býti av rakstraravlopi landskassans	495
181	Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjøld av motorakførum	697
133	Broyting í donsku stuðulsskipanini til heimastýrið	702
100-4	Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, um útbýti av avlopi av tipstænastuni í Føroyum	743

Fiskivinnumál

20	Løgtingslóg um eykajáttan til Ráfiskagrunnin	210
27	Fiskiloyvi til »Háborg«	229
34	Sáttmáli ímillum Føroya landstýri og ríkisstjórnina í kongaríkinum í Danmark øðrumegin og ríkisstjórnina Týska Demokratiska Tjóðveldinum hinumegin um sínamillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið	258
45	Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn veiðimanna	284
57	Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi 1987	340
58	Skipan millum Føroyar og Sovjettsamveldið um sínamillum fiskirættindi 1987	346
59	Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1987	352
61	Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1987	354
62	Broyting í løgtingslóg um studning til fiskivinnuna	356
63	Avtøka av løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski	359
100-3	Fyrispurningur til løgmans um rikna fiskivinnupolitikk	741
10015	Fyrispurningur til Niels P. Danielsen, landsstýrismann, um flytan og fyrisiting av lønjavningargrunninum	763

Flogvallamál

64	Leinging av flogvøllinum í Vágum	360

Fornminnismál

100-1	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um próstagarðin á Nesi	736

EVNISYVIRLIT

		Bls.
	Almannamál	
18	Broyting í løgtingslóg um bjálvingarstuðul til pensjónistar .	205
25	Løgtingslóg um brennistudning til ávisar pensjónistar	403
81	Løgtingslóg um endurgjald til fólkapensjónistar	224
91	Telefonendurgjald til pensjónistar	429
128	Løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku	641
132	Løgtingslóg um eykaviðbót til ávisar avlamispensjónistar ..	700
134	Løgtingslóg um barnastyrk	706
	Arbeiðaramál	
37	Broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd	263
143	Loysn av arbeiðsósemju	729
	Bergholsmál	
96	Løgtingslóg um dupultsporað berghol ímillum Ánirnar, Árnafjørð og Depli	444
97	Uppskot til samtyktar viðvíkjandi bergholi til Gásadals	448
100-18	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um tunnil gjøgnum Kirkjubøreyn	770
	Ferðamannamál	
124	Ferðamannamiðstøðin	623
	Figgjarmál	
9	Skrásetingargjald á akførum	147
10	Broyting í serliga innflutningsgjaldinum	169
11	Broyting í innflutningsgjøldum	177
12	Broyting í eykainnflutningsgjaldinum	182
13	Serligt gjald á brenniolju v.m.	185
14	Gjald av ferðaseðlum	197
15	Gjald av útleigan av sjónbondum	198
16	Broyting í vektgjøldum	199
19	Avtøka av løgtingslóg um býti av rakstaravlopi landskassans .	207
22	Avtøka av serligum gjaldi á brenniolju v.m.	215
23	Lækkan av eykainnflutningsgjaldinum	216
24	Bundin uppsparing	217
51	Broyting í løgtingslóg um býti av rakstaravlopi landskassans	325
73	Eftirgeving av olla gjaldskipan f. skuld til landskassan	378
112	Avtøka av lóg um býti av rakstaravlopi landskassans	495

Fuglaveiðumál

71 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. . . . 372

Gíslar

56 ST-sáttmáli um gíslatøkur 339

Grannskoðanarmál

6-1 Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroya Yvirformyndarí 104
6-2 Grannskoðan av almennum roknskapum Postverk Føroya 105
6-3 Grannskoðan av almennum roknskapum — Mentanargrunnur Føroya Løgtings 108
6-4 Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroya Skúlabókagrunnur 109
6-5 Grannskoðan av almennum roknskapum — Brandvenjingarstøðin við Áir 110
6-6 Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroyskur Happadráttur 111
6-7 Grannskoðan av almennum roknskapum — Sjónvarp Føroya 112
6-8 Grannskoðan av almennum roknskapum — Útvarp Føroya . . 114
6-9 Grannskoðan av almennum roknskapum — Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna 116
6-10 Grannskoðan av almennum roknskapum — Húsalánsgrunnurin, Íbúðagrunnurin, Bjálvingargrunnurin 118
6-11 Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroya Jarðargrunnur 119
6-12 Grannskoðan av almennum roknskapum — Sjónvarp Føroya 120
6-13 Grannskoðan av almennum roknskapum — Telefonverk Føroya Løgtings 123
6-14 Grannskoðan av almennum roknskapum — M/t »Nónhamar« 126
6-15 Grannskoðan av almennum roknskapum — Postverk Føroya 127
6-16 Grannskoðan av almennum roknskapum — Føroya landskassi . . 128
6-17 Grannskoðan av almennum roknskapum — Tjaldurs Apotekið 131

Havnir

70 Bygging av eystaru brimverju v.m. í Kirkjubø 370
74 Útbygging av Sands havn 382
75 Útbygging av Skálavíkar havn 386
116 Vegir og lendingar 537

Heilsumál

39 Lóg um viðgerðarhjálparar (terapiassistentar) 274

40	Broyting í lógunum um sjúkrasystrar	275
42	Broyting í læknalógini	279
50	Norðurlendskur sáttmáli um vinnuútvinnan fyri ávísar starvsbólkar innan heilsuverkið og djóralæknaþjóðiverkið	324
89	Trygdartænasta Føroya	426
117	Um at banna, at roykt verður á almennum støðum	549
119	Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág	555
121	Ókeypis koppseting ímóti barnasjúkum	560
100-17	Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, um útbygging av Hotel Tórshavn	768

Íbúðamál

127	Løgtingslóg um íbúðagrunn	629

Ídnaðarmál

8	Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur	145
41	Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirki	277
46	Uppskot til løgtingslóg um menningarhjálp	298
80	Loyvi til Tórshavnar kommunu til útbygging á Sundi	401
93	Løgtingslóg um oyggjamenningargrunn	433

Landbúnaðarmál

142	Løgtingslóg um landsjørð (88/85)	728

Landsstýrið

	Frágreiðing frá løgmanni	8
36	Broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna	260
100-7	Fyrispurningur til løgmans um reglurnar um tænastuviðurskifti landsstýrismanna	748

Landsstýrismál

135	Landsstýrismál (52/85)	711

Lánsstovnar

72	Avtøka av Vinnulánsgrunni Føroya Løgtings	375
126	Broyting í landsbankalógini	625

Lógamál

43	Broyting í filmseftirlitslógini	281

Logreglumál

68 Viðvíkjandi eykanavning til ferðslupolitiið 367

Løgting

Ólavsøkutingið 1986 3
Eykatingseta 22
26 Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna 228

Løgtingsval

53 Broyting í løgtingsvallógini 329

Menningarmál

138 Uppskot til løgtingslóg um menningarstovu 721

Náttúrumál

44 Sáttmáli um vernd av ferðandi villini djórasløgum (Bonnsáttmálin) 283

Nevndir

Tingnevndir 24
2 Val av álitsmonnum og nevndum 37
140 Val av álitsmonnum og nevndum (1987) 726

Ognarmál

32 Keyp av húsaognum 251
54 Keyp av húsaognum (landslæknahúsini) 335
76 Heimildir og skyldur landsst. at keypa ognir við landskassaveðhaldi 391
105 Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu 477

Ríkismál

33 Atgongd hjá fremmandum herskipum og hernaðarflogførum til danskt øki í friðartíð 254

Rættarmál

1 Rættargangslógin (70/85) 29
3 Broytingar í borgarligu revsilógini (76/1985) 38
7 Løgtingslóg um eydnuspæl v.m. 133
30 Broyting í konkurslógini 243
66 Millumlanda reglur um útlevnan av revsing v.m. 363
69 Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og skemtannarskipanini 369
99 Broyting í tinglýsingarlógini 452

108	Um at seta í gildi lóg í Føroyum lóg nr. 47 frá 10. mars 1965 »Om fragtaftaler med international vejtransport m.v.«, sum broytt við lóg nr. 645 frá 13. december 1978	490
109	Um at lýsa sáttmála um stovnan av Norðurlendska Menningargrunninum fyri útnorður at galda í Føroyum	491
110	Um at seta í gildi í Føroyum Haagsáttmálan frá 2. oktober 1973 um viðurkenning og fremjing av avgerðum um undirhaldsskyldu	492
111	Um at seta í gildi í Føroyum §§ 2 og 3 í lóg nr. 326 frá 4. juni 1986 »Om ændring af adoptionsloven og indfødsretsloven«	493
113	Um at lýsa ST-sáttmála frá 18. december 1979 um avtøku av øllum háttum av mismuni ímóti kvinnum at galda í Føroyum	498
141	Veiting av ríkisborgararætti	726
100-19	Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, um nýggja endurskoðan lóggávuni um bygging	771

Samferðslumál

21	Uppsk. til samt. viðv. flogvallaviðurskiftunum	213
52	Ferðafólka- og farmafar til Mykinessiglingina	327
67	Ábøtur á vegastrekkið Kollafjørður/Hósvík	365
85	Flytan av umsitingini av tyrlutænastuni	414
88	VHF-móttakari og sendari á Eiðiskolli	424
100-5	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann um ætlan landsstýrisins í millumlanda flúgving	744
100-6	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um berghol til Gásadals	747
100-8	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann um elevator á »Dúgvuna«	749
100-9	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann um flogvallamálið	751
100-12	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann um samferðsluviðurskiftini Svínoy/Kallsoy	757
100-13	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann um siglingarrennu Haraldssund	759
100-14	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann um siglingarrennu Haraldssund	762
100-16	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, um flutningssambandið um Vestmannasund	766

Sjónvarpsmál

82 Bygging av sjónvarpshúsi í Eysturoynni 405
86 Avtøka av útvarps- og sjónvarpsgjøldum 416
100 Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum 454
139 Løgtingslóg um útvarps- og sjónvarpsgjaldsstuðning til úvísar pensjónistar 726

Sjóvinnumál

48 Ríkislóg um avtøku av millumlandaræ ttindum um konossement .....
104 Lóg um mynstring 318
114 Løgtingslóg um manning av skipum 499
115 Sjóvinnulóg 513
120 Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving 557
129 Sjómannaløgtingslóg 647

Skattamál

17 Broyting í lóg um áseting av skatti til landskassan 203
101 Endurgjald til familjur, ið vilja passa egin børn 457
123 Broyting í skattalógum (landsskatt og kommunuskatt, áset. av skatti til landsk., innt.sk. av rentum, skatt av rentutryggingum, íløgugrunn, skattl. avskrivingar) 566
130 Løgtinglóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan 695

Skúla- og mentannarmál

47 Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya 301
49 Lán til keyp av húsum til Landsmiðstøð fyri undirvísingarumboð 320
120 Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving 557
122 Skattligur stuðul til sjálvfíggjan av útbúgving 561
136 Løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuvirkið 715
100-2 Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, um studentaskúla og HF í Eysturoy 738

Stýrisskipanarmál

31 Lóg um føroyskt lógavald og stýrisskipan innanfyri danska kongaríkið (heimastýrisskipan 246

Tollmál

95	Broyting í toll- og avgjaldsregl. f. bilar v. ABS-bremsu	412
100-11	Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann um tolllækking eykalutir til bilar	756

Tænastumenn

55	Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir	336
106	Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir	481

Umhvørvismál

79	Føroyskt mótmæli móti bygging av verki til endurútvinnan av kjarnorkubrennievni í Doumreay í Skotlandi	397
87	Demokratisk avgerð um brennistøðina um Lorvík	418
92	Broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing	430
94	Áheitan á IRF um at bíða við at byggja brennistøð	439

Umsitingarmál

98	Lóg um avtøku av lóg um Føroya Gjaldstovu	450
118	Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna	552

Útvarpsmál

86	Avtøka av útvarps- og sjónvarpsgjøldum	416
102	Broyting í útvarpslógini	461
139	Løgtingslóg um útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudning til ávísar pensjónistar	726

Veðlaldsmál

65	Borgan fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu	362

Vegamál

83	Breiðkan av vegnum millum Strendur og Selatrað	409
84	Um útbyggjan av vegakervinum í Eysturoy	412
116	Vegir og lendingar	537
100-10	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann um vegagerð Funning-Funningsfjørð	753

Vinnumál

35	Bann móti handli við Suðurafrika og Namibia	258

Ólavsøkutingið 1986

Ár 1986, ólavsøkudag kl. 13.00 varð løgtingið sett. Løgtingsformaðurin frá seinastu tingsetu, Jákup Lindenskov, setti tingið sambært skriv dagf. 14. juli 1986.

Tingmenninir eru:

Norðoya valdømi:

Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Poul J. Olsen, Klaksvík, jf.,
Asbjørn Joensen, Klaksvík, sj.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, tf.,

Eysturoyar valdømi:

Olaf Olsen, Fuglafirði, ff.,
Jógvan Olsen, Toftir, sb.,
Johs. Martin Olsen, Strondur, sb.,
Jørgen Thomsen, Skála, jf.,
Signar Hansen, Fuglafirði, tf.,
Adolf V. Hansen, ff. og kr. ff.

Norðstreymoyar valdømi:

Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.,
Tummas Arabo, Signabøur, jf.,
Øssur av Steinum, Vestmanna, tf.,

Suðurstreymoyar valdømi:

Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Poul Michelsen, Tórshavn, ff.,
Jógvan Sundstein, Tórshavn, ff.,
Pauli Ellefsen, Tórshavn, sb.,

Eilif Samuelsen, Tórshavn, sb.,
Jóannes Dalsgaard, Tórshavn, jf.,
Jákup Lindenskov, Tórshavn, jf.,
Karin Kjølbro, Argir, tf.,
Erlendur Patursson, Kirkjubø, tf.,
Tordur Niclasen, Leiði, ff. og kr.f.,

Vága valdømi:
Svend Åge Ellefsen, Sandavági, ff.
Ivan Johannesen, Miðvági, sb.,

Sandoyar valdømi:
Eyðun Viderø, Sandi, ff.
Tórálvur Mohr Olsen, Sandi, jf.,

Suðuroyar valdømi:
Flemming Mikkelsen, Vági, sb.,
Sverre Midjord, Tvøroyri, jf.,
Henrik Old, Tórshavn, jf.,
Hergeir Nielsen, Leitið, Akrar, tf.,

Fyribils formaðurin bað Karina Kjølbro og Eyðun Viderø um at virka sum ávíkavist 1. og 2. tingskrivari fyribils.

Formaðurin las síðani minningarorð um Erlend Patursson, ið andaðist 16. juni 1986, og sum var tingmaður í tíðarskeiðinum 1954 - 1966 og frá 1970 - 1986, og um Marius Johannesen, sum andaðist 16. juli, og sum var tingmaður frá 1958 - 1966. Eisini las formaðurin minningarorð um Jóannes Sløttanes, ið andaðist 26. juli og sum var tingmaður frá 1943 - 1945. Formaðurin bað tingmenninar minnast hesar triggjar við tøgn eina løtu.

Síðani las formaðurin skriv frá Tjóðveldisflokkinum, har biðið verður um, at næst valdi á listanum í Suðurstreymoy fær sætið á tingi eftir, at Erlendur Patursson er farin. Við 28-0 atkvøðum varð samtykt, at Hans Jacob Debes skuldi taka sætið á tingið fyri Erlend Patursson.

Síðani varð nýggjur formansskapur valdur. Fyri samgonguna varð Jákup Lindenskov valdur til formann og Hergeir Nielsen til 2. næstformann. Andstøðan valdi Agnar Nielsen til 1. næstformann og Jógvan Sundstein til 3. næstformann.

Sum 1. tingskrivari var Karin Kjølbro vald og sum 2. tingskrivari var Flemming Mikkelsen valdur.

Formaðurin gav síðani Atla Dam, løgmanni, orðið til løgmansrøðuna á ólavsøku 1986.

31. juli las formaðurin skriv við mótmæli frá limum í landsnevndini hjá Kristiliga Fólkaflokkinum Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum.

4. november boðaði formaðurin frá vegna Adolf V. Hansen, at hann nú umboðar Framsóknarflokkin á tingi.

6. november boðað formaðurin frá, at Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, stendur sum stovnari av Framsóknarflokkinum.

29. januar 1987 boðaði formaðurin frá broyting í formansskapinum. Málið varð útsett til næsta fund.

3. februar 1987 boðaði tingformaðurin sbrt. dagsskrá frá vali av nýggjum tingformanni, 2. næstformanni, 1. skrivara og umboðið í Norðurlanda Ráðið. Við 17 atkvøðum vórðu valdir:

1. tingformaður: Hergeir Nielsen,
2. 2. næstformaður: Sverre Midjord,
3. 1. skrivari: Jákup Lindenskov,
4. Umboð í Norðurlanda Ráðnum:
   Fastur limur: Jákup Lindenskov,
   tiltakslimur: Jóannes Dalsgaard.

Við tað at freistin til at leggja uppskot fram varð sett til 3. mars, boðaðu hesi sama dag frá fylgjandi framløgum:

Fólkaflokkurin:

1. Um berghol millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli.
2. Vegaføring í Leirvík.
3. Berghol til Gásadals.
4. Um hjálp til farmaskip.

Pauli Ellefsen:

1. Trygdarútgerð í bilum - ABS - tollbroyting,
2. Viðvíkjandi tryggingarreglum.
3. Viðvíkjandi avgjaldi upp á olju.
4. Viðvíkjandi Tórshavnar kommunu.
5. Viðvíkjandi farmaskipum.

Óli Breckmann:

1. Frælsi at skipa seg í fakfeløg,
2. Endurgjald til familjur, ið vilja passa egin børn,
3. Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum,

4. Broyting í útvarpslógini,
5. Skattligur stuðul til sjálvfigging av útbúgving,
6. Húshjálp við skattafrádrátti.

Føroya Landsstýri:

1. Løgtingslóg um apotek,
2. Broytingar í sjómansløgtingslógini,
3. Mynstringarlóg,
4. Manningarlóg,
5. Lóg um sjóvinnubrøv,
6. Lóggáva um sjóvinnuskúla,
7. Broyting í lóggávuni um eftirløn til tænastumenn,
8. Alilóg,
9. Broyting í lógini um skráseting av motorakførum,
10. Møguligar broytingar í tolllógini,
11. Lóggáva um gjaldsstovuna,
12. Broyting í tinglýsingarlógini, pantseting av alifiski.
13. Broyting í lóg um Landsbanka,
14. Lóg um menningarstovu,
15. Lóg um barnsburðarhvíld,
16. Lóg um dagpeninga.....
17. Broyting í fólkapensjónini,
18. Broyting í avlamislógini,
19. Barnatilskot,
20. Lóg um útvarps- og sjónvarpsgjald fyri pensjónistar,
21. Veðhald fyri lánum til kommunur frá kommunukredittfeløgum,
22. Stuðulsskipanin til fiskivinnuna,
23. Broyting í skattalógini,
24. Býti av avlopi landskassans,
25. Keyp av húsaognum,
26. Broyting í lóg um íbúðagrunn,
27. Lóg um endurgjald fyri smolt í samband við furunkolosusjúkuna,
28. Avtøka av Vinnulánsgrunninum,
29. Møguligt uppskot í samband við farmaskipakeyp.

26. mars 1987 bað løgtingsformaðurin um generelt loyvi til frávik viðvíkjandi tíðarfreistini hesa tingsetuna.

Hetta varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Frágreiðing frá løgmanni 1986

Fýraflokkasamgongan setti sær setningin at broyta búskapargongdina, sum verið hevði undanfarin ár, har uttanlandsskuldin vaks í risalopum og var komin upp ímóti 3100 milliónum við útliti til at vaksa upp í 5-6 milliardir eftir 3-4 árum.

Hvussu hetta hevur eydnast, eru helst ymiskar metingar um; men mong tekin eru um, at broyting er hend. Broyting til tað betra, um enn langt ífrá er rokkið á mál.

Búskapur okkara er sera viðbrekin, so teir batar, hagtølini sýna, kunnu verða foknir komandi árini, verður ikki ein sera føst stýring sett í verk. Tað, sum sagt varð seinasta ár um tey eftir føroyskum viðurskiftum heilt serligu tiltøk, sum mugu setast í verk, er tí framvegis galdandi, skulu vit nærkast eini javnvágsstøðu, har framleiðslan stendur mát við nýtslu, íløgur, renting og avskrivingarkostnað.

Eins væl stendur fast, at tiltøkini mugu fremjast samskipað fyri øll samfelagsøki.

— — — — — —

Tað týdningarmesta tekinið um eina broytin í búskapinum er gongdin í uttanlandsskuldini, ella minkingin í vøkstri í uttanlandsskuld í mun til tær metingar gjørdar vórðu og tær upphæddir, serliga árini 1983 og 1984 sýndu.

Nettoskuldin til útlond vaks í 1983 við 645 mill. kr. og í 1984 við 810 mill. kr., meðan økingin í 1985 var 340 mill. kr. og í 1986 er mett til 150 mill. kr.

Heystin 1984 mettu búskaparfrøðingar og aðrir, at skuldin við árslok 1985 fór at verða útvið 4 milliardir, og eftir teirri gongd, tá var, við árslok 1986 umleið 4,6 milliardir.

Skjølini hjáløgd løgmansfrágreiðingini í ár sýna, at hon heldur verður 3.555 milliónir kr. ella meira enn 1. milliard minni enn mett í 1984.

Hesi tøl eru helst óvæntað fyri mong teirra, sum hava havt ampa av tejm stóru skipaíløgunum, sitandi samgonga tók avgerð um í fjør. Skipaíløgurnar í 1986 verða umleið 675 mill. kr. mótvegis 750 í 1985 og 1.014 í 1984.

Tað eru tvinnar høvuðsorsøkir til bøttu búskaparligu gongdina. Onnur, tiltøk landsstýrisins á ymsum økjum og royndirnar at fremja eina stýring, og hin, búskapurligt viðrák uttanlands.

Serliga lætti prísfallið á olju, tí tað kemur helst at merkja eina spuring upp á 120 mill. kr., meðan kursfallið á dollara og norskari krónu gevur eina kursvinning í uttanlandsskuldini upp á 130 mill. kr. Hetta kursfall merkir hin vegin, at ein væntaður prisvøkstur á fiski ikki gerst veruleiki; men at vit mugu rokna við óbroyttum útflutningi í krónuvirði. Nýtt fyribrigdi, sum minkar um tyngdina av skipaíløgunum, er eisini rentuískoytið, sum norski staturin rindar, tá ið hygt verður í Noregi. Hetta ískoytið er í 1986 umleið 55 mill. kr., og eru skipaíløgurnar tí í veruleikanum ikki 675 mill. kr., men 620 mill. kr.

Hesi fyribrigdi, sum eru í útlendska búskapinum, hava vit lítla og onga ávirkan á, tó at vit kunnu nýta tey meira og minni skilagott, tí er neyðugt at brynja seg í innlendska búskapinum enn meira, tí tey tiltøk, landsstýrið framdi í 1985 og fyrru helvt av 1986, muna enn ikki nóg mikið, tá virkanin av teim stóru íløgunum, ætlanir eru um í 1987 og 1988, og tí virksemi, sum hesar orsaka, er havt í huga. Teir smáu batar, vit í dag hóma, verða lættliga tiknir út av fyrsta óløgi, fremja vit ikki nógv strangari tiltøk. Vit kunnu ikki verða nøgd, fyrr enn uttanlandsskuldin veruliga fer at minka, ella ið hvussu er lutfallið millum uttanlandsskuld og bruttotjóðarframleiðslu minkar munandi, og enn er gongdin í hesum ikki nøktandi.

Lutfallið millum uttanlandsskuld og bruttotjóðarinntøku var við árslok 1984 umleið 63%, og væntaðu vit, at tað fór at vaksa upp um 70%, áðrenn vend kom í, og í 1985 vaks hetta eisini til 65%, men fæst helst við árslok 1986 niður á 59%. Hetta tal er eisini ov høgt. Sum fráboðað longu í 1984 er hóskandi málsetningur at koma niður ímóti 30-35% í hesum valskeiði. Hetta verður sera torført at røkka, tí íløguvirksemið í 1987 og 1988 verður sera høgt til tess at skapa møguleika fyri at framleiða seg burtur úr tronganum, tí sum so ofta sagt, ber ikki til bert at spara seg burtur úr trupulleikunum.

500 dagar

Vísandi til, at eg í valstríðnum nevndi 500 dagar sum hóskiligt tíðarskeið at fremja slíkar fyriskipanir og lóggávur, at vit yvir eitt áramál komu burtur úr búskaparliga ójavnanum, spyr onkur, hví okkara búskaparviðurskifti ikki eru heilt í lagi nú.

Rætt er, at teir 500 dagarnir júst eru farnir, men tað, ið sagt varð, var, at hesir 500 dagar skuldu nýtast til fyriskipan og tilrættalegging av politikki, sum upp á longri sikt bar á rætta bordið, og ikki, at alt var greitt eftir 500 døgum.

Líta vit 500 dagar aftur, má ásannast, at nógv av teim tiltøkum, sum skuldu fremjast, eru framd og menna nú búskapargongdina, meðan einstøk eru eftir at seta í verk, slík, sum krevja longri fyrireikingartíð ella tiltøk, sum eru seinkað í viðgerðini.

Broyting í búskapargongdini eru neyvan mál í sjálvum sær, heldur tað at leggja kósina inn í slíka javnvágsstøðu, at aftur kann gevast høvi at fremja nýskipanir í umstøðunum hjá vanligum borgarum og lætta um tær eykabyrðar, vit

mugu bera av slíkum nýskipanum. Fyri einstaka borgaran, sum noydist at bíða eftir nýskipanunum (reformunum) er tað tó ein troyst, at realløtnarfallið, sum var frá 1980-85, nú er steðgað, og ein lítil hækking komin í staðin.

Millum tey tiltøk, sum eru framd, eru broytingar í skatta- og avskrivingarreglunum, og miða hesar ímóti at býta byrðarnar á fleiri herðar enn áður og at bera samfelagnum nakað av samfelagsskaptum vinningi aftur. Hetta arbeiði kemur at halda fram, so alt fleiri øki koma undir eina rættvísari og skilabetri skatting.

Tænastustøðið mótvegis skattaborgaranum verður bætt í hesum ári við stovnsetan av eini upplýsingardeild á líkningarráðnum.

Ein rationellur floti, góð stovnsrøkt og eitt dyggari søluarbeiði eru einastu tiltøkini, sum muna, skulu vit eiga eina fiskivinnu, sum stendur seg í kappingini við aðrar.

Hin sokallaði fiskivinnustudningurin — sum fordeilir ágóðan ella samfelagsognina — var í 1984 omanfyri 400 mill. kr., hann verður í 1986 umleið 265 mill. kr. og eigur at minka enn meira. Tá fyrstani fáa vit ráð at fremja flyting av orku av grunna vatninum og meðalvatninum og ráð til rationalisering av útróðrarflotanum. Td. verður tá peningur til »kondemnering« av skipum, tá umstøður eru til úthygging av øðrum møguleikum í staðin.

Stuðulslán til skipabygging eru minkað og verða bert veitt við hygging í Føroyum. Veðhaldini eru minkað niður í 15%, og er ætlanin at fara niður á 10% næstu ferð, játtað verður til bygging uttanlands. Hetta fyri, at tað er dygdin í einum skipaprojekti heldur enn landskassaveðhald, sum kreytar figging.

Samgongan hevur roynt at leggja alment íløguvirksemi í fastar karmar — so eitt spakuliga minkandi ella støðugt íløguvirksemi kann verða, men trupulleikarnir við stýring av samlaðu íløgunum eru stórir, m.a. vegna tørvandi lóggávu og ov lítið útbygt samarbeiði millum landið, kommunur, privatar og peningastovnar.

Tiltøk framyvir

Í heyst verður tí veruliga lagt til brots fyri at fáa avtalur ílag við kommununar viðvíkjandi útsetan av ávísum íløgum, ætlanir eru um, og eisini avtalur við peningastovnarnar um afturhald í figging av slíkum íløgum, sum samfelagsliga tola at bíða.

Seinasta hálva árið hevur íløguvirksemið verið sera stórt, ja, so stórt, at tøk arbeiðsmegi hevur ikki verið í Føroyum, og verða mong arbeiði tí gjørd av útlendingum, meðan onnur verða framd av fólki, sum er tikið úr framleiðsluvinnuni.

Henda gongd má broytast, tí upp á longri sikt minkar hon um kappingarførið hjá framleiðsluvinnuni, skapar ójavna í lønarlagið og kann soleiðis goyma vanda fyri búskaparligum afturstigi.

Taka vit til dømis íløguvirksemið í Tórshavnar kommunu, sæst at hetta er tvífaldað frá 1983 til 1984 og aftur frá 1984 til 1985 og uppaftur frá 1985 til 1986, ella úr umleið 20 mill. kr. í 1983 til útvið 150 mill. kr. í 1986. Hetta tykist í so nógv at seta í gongd í senn.

Búskaparligu avleiðingarnar hómast í hagtølunum, har handilsjavnahallið — skip undantikin — økist við 20 mill. kr. til 441 mill. kr., og stavar hetta m.a. frá einum mettum vøkstri í innflutningi av nýtsluvørum upp á 12%.

Verða ikki avmarkandi tiltøk sett í verk, er nú vandi fyri, at stóra virksemið, og nýtslumøguleikarnir sum fylgja tí, skapar eina bólgnan í innflutningin av óproduktivum vørum.

Eitt nýtiligt amboð í hesum sambandi verður ætlaða tvungna sparingin fyri inntøkur oman fyri 130.000 kr.

Árini 1987 og 1988 verða tí royndarstundin fyri búskaparpolitikk samgongunnar.

Uppihaldast skal íløgupolitikkur á høgum stigi, tá tað snýr seg um skapan av nýggjum framleiðslum, og tænastustøði borgarans ikki versna, óproduktivar íløgur útsetast, uttan at arbeiðsloysi gerst, og handilsjavni og gjaldsjavni samstundis bøtast, og samstundis mugu tey møguleikaskerdu fáa betri sømdir enn nú.

Hetta tykist torført samstundis, men er einasta gongda leið, tí sparing, skerjing og avmarking einsamøll fáa okkum ikki aftur á beint. Tað er alt ov stórur partur av samfelagsframleiðsluni, sum tá skal setast til viks. Tað vildi verið sum at toga seg sjálvan upp eftir hárinum.

Tey lond, sum royndu hetta, kollsigldu. Afturhaldið má sameinast við ein framtaksmerktan og »ekspansivan« politikk, sum goymir framtíðarvónir og dirvi til vágamikla nýroynd.

Landsstýrið hevur nú fingið skipað eina húskapardeild, sum vónandi kann ráðleggja skilagott um hesa torføru stýring, og sum kann megna at leggja virksemi landsbankans til rættis og fáa hann at virka.

Tað eru so mangir tættir í samlaða húskapinum, sum hætta sær øðrvísi enn væntað, og sum undir serligum umstøðum ávirka hvør annan øðrvísi enn ætlað. Til tess at fáa vitan um hetta so tíðliga sum gjørligt, so móttiltøk kunnu fremjast, er neyðugt við úthygdari fíggjarfrøðiligari og búskaparligari vitan, og má tí umsitingarorkan á hesum øki útbyggjast enn meira.

Ein orsøk til, at vøksturin í uttanlandsskuldini ikki gjørdist størri enn 150 mill. kr., hóast tey óteljandi lánitilboðini uttaneftir, og hóast at hundraðir av nýggjum milliónum blivu lænt uttanlands, er helst, at fult var frammanundan, soleiðis at hesi lán endaðu í føroyskum peningastovnum, ið aftur keyptu útlendsk lánsbrøv fyri munandi part av teimum, men viljin og evnini á føroyskari síðu av nýta hesi lán heima veksur alsamt, og kann tí ikki væntast, at keypt verða lánsbrøv í sama mun aftur komandi árini, tí er alneyðugt, at stýring fæst á hesar peningastreymar út úr og inn í føroyska samfelagið.

Føroyskir bankar hava ikki kappast sínámillum fyrr, eitt sindur meira nú, men serliga hava bíligu lánsmøguleikarnir uttanlands broytt arbeiðsumstøður teirra. Vónandi økir hetta um áhuga teirra i samvinnu við hitt almenna yvir ein landsbanka, sum veitir neyðugan likviditet, tá slíkur tørvar, og avmarkar

likviditet, tá tað er neyðugt, tryggjar javna kappingarstøðu og annars samskipar peningastreymin millum Føroyar og umheimin.

Peningastovnar okkara verða í heila takið lyklalið í tí arbeiði, sum skal gerast komandi. Vit kunnu t.d. ikki loyva teimum so óblúgvt at súgva pening úr landskassanum gjøgnum ovurrentu á vinnulívið, sum so skal hava endurgoldið frá landinum. Vit kunnu heldur ikki góðtaka útreiðsluøkingar í eini tertiervinnu heilt upp í 19% árliga. Tá sparsemi annars er sera umráðandi í samfelagnum sum heild, mugu teir, sum umsita okkara peningavirði, vísa hesta fyridømið.

Annað, sum komandi árini eisini má skipast betri, er alt søluarbeiði okkara. Hvørt neyðugt verður við lóggávuarbeiði í hesum sambandi, mugu vit nú viðgera í álvara, men givið er, at tær bindingar, sum knýta vinnuna í eina alt ov stirvna søluskipan, mugu loysast eitt sindur.

Sum nevnt er búskaparútlitið í 1986 eitt sindur bjartari, men blíðari byrðurin uttanlands fær ikki somu ávirkan í 1987 og 1988, so tá skulu innlendis tiltøkini veruliga standa sína roynd.

Fortreytirnar undir hagfrøðiligu metingunum um eitt gjaldsjavnahall í 1986 upp á 280 mill. kr., og vøkstur í uttanlandsskuld upp á 150 mill. kr. eru ein meðal kursur fyri dollara í 1986 upp á 8,45. Ein prísvøkstur í fremmandum gjaldoya fyri tosk og upsa samanlagt 15%, hýsu og annað flak 20%, eingin prísbroyting fyri salt- og íðnaðarfisk og eitt minni fall í rækjuprísinum.

Halda hesar fortreytir ikki, verða smærri broytingar, men valla koma tølini at víkja meira enn 100 mill. kr. frá teim í fylgiskjølunum givnu.

Landskassans fíggjarorka í hesum fíggjarári hevur verið hampulig. Meiriinntøkurnar í mun til fíggjarlógina verða mettar til 121 mill. kr., men fáa hesar tíverri bein at ganga á, nú so mong landskassaveðhald gerast effektiv, bæði viðvíkjandi farma- og fiskiskipum og einstøkum virkjum á landi, samstundis sum trekkið upp á grunnin til endurnýgging skipaflotans er munandi størri enn játtanin.

Fiskivinnuútlitið — Rakstur skipaflotans

Føroyskir fiskimenn hava framvegis áræði og dirvi at fara undir nýggjar royndir.

Roynt verður har áður óroynt var, uýggj fiskasløg, nýggir veiðuhættir og ikki minst nýggir viðgerðarhættir koma í nýtslu.

Nøkur skip av teim 19, landsstýrið gav loyvi til seinasta ár, eru komin í vinnu, og royndirnar, gerast kunnu við teim, geva okkum møguleika at taka enn nøkur stig fram ímóti røttu útgerðini til hesi skip.

Framvegis eri eg sannførdur um, at tað er rætt at fremja íløgur í nýggju svartkjaftaskipini, rækju- og skeljaskipini og helst um stutta tíð eisini í surimiframleiðslu umborð.

Royndirnar við »Andrias í Hvannasundi« hava sýnt, at til ber at veiða svartkjaft ta árstíð, har áður ikki kundi roynast, at til ber at fáa sera gott fars burtur

úr smáum svartkjafti, sum áður ikki var viðgjørdur, og at nýggju maskinurnar minka um manningartalið umborð. eisini hevur pumpuskipanin roynst so mikið væl, at arbeiðshátturin er avgerandi broyttur til tað betra, og kann fongurin nú bjargast sum 1. flokks vøra. Tað, ið ikki royndist, var móttøkuskipanin og goymsluskipanin til rávøru, eins og talið av skerimaskinum var ov lítið.

Farsið er selt fyri ein prís, sum liggur munandi hægri enn áður.

»Olaf í Garðastovu« er nú farin í vinnu, og eisini hann prógvar, at til ber at veiða svartkjaft á hásumri, so útlítið, at vit nú endaliga nærkast málinum í hesi vinnu aftan á 14 ára royndir, er gott.

Fiskirannsóknarstovan fyriskipar eins og í fjør royndarveiðu eftir jákupsskel í Barentshavinum, og er helst grundarlag fyri slíkari vinnu. Spell, at skipabyggingin til hesa veiðu er nakað seinkað.

Á Hattonbankanum royndu trolarar okkara nakað í vár, og tað korttilfar, fingið er til vega, vísir, at her er ræktiliga vitt fiskiøki at troyta, so møguliga kann hetta øki saman við Reykjanesrygginum veita okkum ískoyti ístaðin fyri nøkur av teim ræktlindum, vit hava mist.

Heldur gongdin í fiskiveiðuavtalunum eisini framyvir, skuldu útlit verið fyri framhaldandi vinnumøguleikum til okkara sjófólk, ja slíkir, at vit helst eisini megna at fáa skil á veiðuna á egnum leiðum, sum liggja undir støruin trýsti.

Hetta trýst er orsøkin til, at landsstýrið eina tíð framyvir í iløgupolitikkinum noyðist at krevja skip úr flotanum fyri nýggj, sum koma, men hetta er ikki stýringsamboð, sum kann nýtast varandi. Eins væl og innflutningsbannið, verða skuldi undir seinastu samgongu, vil umbýtiskravið ørkymka eina náttúrliga endurnýgging, so væl sum tað vil avlaga ognarviðurskiftini í flotanum, so sum tey helst skuldu verið, við avgerandi ávirkan til veiðumenninar sjálvar.

Veiðan fyrra hálvár í ár er 171.000 tons, mótvegis 190.000 tonsum fyrra hálvár í 1985.

Tær størstu broytingarnar eru, at eingin lodna fekst í Barentshavinum í ár, og at upsaveiðan undir Føroyum er minkað ikki færri enn 6.000 tons.

Hetta, at upsaveiðan er so nógv minkað, er kanska álvarsligasta »varskóið« í veiðutølunum í ár, tí veiðuorkan er samstundis økt munandi.

Sambært metingum fiskivinnuráðsins verður rakstur flotans heldur lakari í ár enn seinastu árini, men síðan hesar metingar vórðu gjørdar, er oljuprísfallið vorðið nógv størri, so landsstýrið ætlar ikki at økja karmin í stuðulsveitingini, so sum ynskt hevur verið um, men heldur fast um 265 mill. kr. í hesum fíggjarári, og skjýtur upp eina spakuliga minking framyvir.

Í hesum liggur eisini, at ein fegin vil eggja vinnuni sjálvari at troðka á søluskipanir sínar, soleiðis at hesi dúva minni upp á stuðningin og heldur útvega meira fyri framleiðsluna.

Ídnaðarmál

Í 1984 høvdu flakavirkini sum heild trupulleikar við rakstrinum. Á heysti hetta árið søktu 9 flakavirkir um veðhald fyri likviditetsláni, sambært løgtingslóg nr. 90 frá 4. oktober 1984.

Undanfarna landsstýrið hevði samtykt at játta allar 9 umsóknirnar við at veðhalda fyri 1,5 mill. kr. í hvørjum einstøkum føri, men við tað at umsóknirnar ikki vórðu sendar figgjarnevndini, tá landsstýrisskiftið fór fram, tók nývalda landsstýrið ta støðu, heldur at lata eina nevnd av sakkønum kanna støðuna hjá flakavirkjunum.

Í februar 1985 varð nevndin sett. Nevndin fekk álagt at kanna flakavirkini í síni heild og at kanna tey 9 flakavirkini hvørt sær. Kanningin fevndi um tað framleiðsluteknisku, tað figgjarliga og leiðsluviðurskiftini.

Í apríl 1986 var flakavirkisnevndin liðug við arbeiðið. Nevndin hevur latið landsstýrinum eina heildarlýsing av føroysku flakavirkjunum.

Hetta tilfar hava tingmenn fingið sendandi. Nevndin hevur eisini latið landsstýrinum eitt annað álit, sum er ein serviðgerð av teimum virkjum, ið høvdu søkt um veðhald fyri likviditetsláni.

Arbeiðið við at loysa trupulleikarnar hjá hesum virkjum er nú komið so langt, at talan bert er um tvey virkir, ið ikki eru endaliga viðgjørd. Hesi virkir verða viðgjørd í landsstýrinum í løtuni, og landsstýrið roknar við einum úrsliti um heilt stutta tíð.

Arbeiðið við at fyrireika stovningina av Menningarstovuni hevur tikið longri tíð, enn ætlað varð fyri einum ári síðani. Fyribils hevur landsstýrið yvirtikið raksturin av ídnaðarstovuni. Starvið sum ídnaðarráðgevi verður nú lýst leyst, og væntandi verður nýggjur ídnaðarráðgevi settur frá 1. oktober.

Uppskotið um Menningarstovu verður lagt fyri tingið í hesi tingsetuni, soleiðis at Menningarstovan kann fara undir virki sítt í seinasta lagi 1. januar 1987.

Í løtuni eru nakrar áhugaverdar ætlanir um ídnaðarbygging til viðgerðar. Serligan áhuga hava góðskingarvirkir til fiskaúrdráttir og svartkjaftavirkir, tí rávørutilfeingið á hesum økjum er ríviligt, og neyðugt er at tryggja skjótari vøkstri í útflutningi okkara, nú uttanlandslánini tyngja so nógv.

Landbúnaðurin

Uppskot til nýggja jarðarlóggávu varð lagt á tingbord í undanfarnu setu, og varð málið beint í búnaðarnevndina, sum varð millumtinganevnd, sum síðan kemur aftur við málinum í ólavsøkutingsetuni.

Arbeitt verður framvegis við málinum um prísjavningargrunn, ið ætlast figgjaður við avgjøldum á onkrar av teimum innfluttu búnaðarvørunum.

Hin stóri vøksturin í mjólkaframleiðsluni er steðgaður, hóast talan framvegis er um vøkstur, men nú er ársframleiðslan javnari.

Royndarstøðin er nú liðug og lutvist tikin í brúk (alment siðst í august).

Í samband við játtan á fíggjarlógini til vakstrarhúsvirksemi og urtagarðsbrúk er nú reglugerð gjørd.

Alivinnan

Eftir at sitandi landsstýrið hevði tikið við, varð umsitingin av alivinnuni umskipað. Aliráðið varð valt at ráðgeva landsstýrinum í øllum spurningum vinnuni viðvíkjandi.

Rættiliga skjótt komu aliráðið og landsstýrið til ta niðurstøðu, at ov lítið samsvar var ímillum smoltframleiðslu og talið av givnum loyvum til aling á sjónum.

Undanfarna landsstýrið hevði givið eini 50 loyvi til aling á sjónum uttan at tryggja hesum, at smolt fekst til brúkini. 14.000 smolt í part geva ikki grundarlag fyri lønandi rakstri, og verður smoltið eisini partvís ov vánaligt, tá alt verður slept í ringarnar. Ein munandi større smoltframleiðsla varð tí fyrsti málsetningurin hjá sitandi landsstýri og aliráðnum.

Í 1985 høvdu vit nýggju smoltstøðir við eini framleiðslu uppá 2 milliónir av laksasmolti og sjóbúnum sílum. Við árslok 1985 gav landsstýrið loyvi til 10 nýggjar smoltstøðir. Hetta ber í sær, at framleiðslan í 1986 verður 2,6 mill., í 1987 3,9 mill., og í 1988 verður samlaða smoltframleiðslan 4,5 mill. stk.

Hetta verður trygt støði undir fleiri nýggjum loyvum til aling á sjónum tey næstu árini. Teir næstu mánaðirnar fara aliráðið og landsstýrið at geva fleiri nýggj loyvir til aling á sjónum. Hesar alistøðir sleppa í gongd so við og við, ella so hvørt sum smoltstøðan batnar. Eftir tilmæli frá aliráðnum hevur landsstýrið samtykt, at fleiri nýggj loyvir ikki verða givin á ávísum økjum. Her er talan um økir, har talið av alistøðum er ov stórt.

Prísurin á alifiski er nógv fallin hesar seinastu mánaðirnar. Hetta og nógv annað talar fyri, at vit eiga at vera rættiliga varin við at gera ov stórar íløgur í vinnuna. Óneyðugar íløgur eiga als ikki at koma fyri. Áhugin fyri at gera íløgur í sláturvirkir til alifisk er stórur og vaksandi í løtuni. Men her eiga vit at lata skynsemið ráða. Stórar og óneyðugar íløgur í yvirkapacitet á hesum øki kunnu geva alivinnuni mønustingin. Landsstýrið hevur vónir um, at prísurin á alifiski aftur fer at hækka nakað, men talan verður neyvan um tann heilt óvanliga høga prísin, sum verið hevur hesi seinastu tvey árini.

Samanumtikið má sigast, at er íløgan skynsom, og er talan um skilagóðan rakstur, so kann henda vinna bera seg, bert prísurin hækkar nakað í mun til verandi prís.

Til fyri trimum mánaðum síðani varð ongin sjúka staðfest millum føroyskan alifisk. Síðani tá eru ikki minni enn tríggjar ymiskar sjúkur staðfestar. Tann triðja og seinasta sjúkan, sum eitur furunkulosa, er tann vandamiklasta.

Í samráð við veterinérmyndugleikarnar tók landsstýrið ta støðu at gera eina álvarsliga roynd til tess at basa sjúkuni beinanvegin. Allur fiskur, ið var undir illgruna, varð dripin. Higartil bendir alt á, at henda roynd hevur eydnast. Gongdin seinastu mánaðirnar talar fyri, at vit eiga at hava strangar reglur á

hesum øki, og at veterinértænastan má mennast við djóralæknum og øðrum kønum fólki. Hetta hevur landsstýrið tikið til eftirtektar.

Í seinastu tingsetu vórðu tvær bráðfeingislógir samtyktar eftir uppskoti frá landsstýrinum. Onnur setir forboð fyri innflutningi av øllum livandi fiski og rognum. Hin ásetir greiðar reglur um, at eingin kann fara undir at ala uttan landsstýrisins loyvi. Síðani hevur landsstýrið arbeitt við øðrum lógarsmíði á hesum øki. Trý lógaruppskot oru nærum greið at leggja fyri løgtingið. Talan er um eina meira umfatandi veterinérlóg, um lóg um Trygdargrunn Alivinnunar og um løgtingslóg um fiskaaling.

Landsstýrið umhugsar í løtuni, hvussu arbeiðið hjá P/f Fiskaaling kann umskipast, soleiðis at størri dentur verður lagdur á royndir, gransking og útbúgving av fólki, og at rakstraravlopið hjá felagnum kann nýtast til hesi endamál.

Farmasiglingin

Farmaskiparakstur okkara er framvegis í andróðri, hóast farmagjøldini hava knógvað uppeftir, og hóast oljuprísfallið hevur lætt nakað um raksturin hjá farmaskipunum.

Flestu teirra vinna ikki til avdráttir og mong heldur ikki til rentur, so vandin fyri, at vit missa enn okkurt av hesum stásiligu skipum, er framvegis hóttandi.

Sum áður sagt eru møguleikar tess almenna at stuðla sera avmarkaðir. Kreppuhjálparheimildir eru ikki, og landsstýrið hevur einki ynski um at seta kreppulógartiltøk í verk. Tað er tí einans landskassans partur av effektivum veðhaldum, sum kunnu dugna hesum feløgum styttri tíð. Vónandi so mikið, at lánveitararnir veita longir skáa, sannandi at fleiri av hesum skipum eru sera væl rikin.

Ískoytið frá ferða- og farmaskipum til bruttofaktorinntøkuna var í 1986 útvið 180 mill. kr., harav 75 mill. kr. í hýrum, meðan ískoytið til gjaldsjavnan varð 128 mill. kr.

Hetta er ov lítið, tá hugsað verður um milliardíløguna, men megna vit at varðveita hesi skip, koma tey upp á longri sikt at gagna føroyskum búskapi.

Henda vinnan skuldi ligið so væl fyri okkum føroyingar sum nøkur onnur vinna.

Syrgiliga forsøgan, har hugmóðugir, sokallaðir liberalistar, beindu fyri eini skilagóðari fyriskipan í útbyggingini av hesi vinnu, ger tað ikki lættari at rætta skeivleikarnar, tí henda liberalisman er oftast so, at bert landskassin er opin, so stendur hon mál, men vit hava ikki rætt at bjóða skattgjaldaranum slíka liberalismu.

Orkuútbyggingin

Kjakið um vatnorkuútbyggingina hevur tikið eina avgerandi vend, og metir nú frægasti sakkunnleiki okkara, at S.E.V. ikki hevur verið serliga skynsamt í projektering síni av útbyggingini.

Spell var hetta, tí tað, sum longu bygt er, gevur ov lítið og er hartil umhvørvinum nógv meira nærgingið, enn neyðugt var. Hetta má tó metast sum farið, men kravið má framvegis vera, at møguliga orkan fæst burturúr, og tá honda kann økjast við meira enn 50%, skuldu nú øll líkindi verið fyri, at vit í félag bjarga tí, ið bjargast kann, og broyta útbyggingina soleiðis, at hildið verður fram í hæddini. Sí álit orkuráðsins.

Fáa vit hesi viðurskifti í rættlag, verður eisini meira megi tøk og peningur at fara munabetri og skjótari til verka í orkusparingartiltøkum og útbygging av t.d. vindorkumi.

Íbúðarmál

Í seinastu tingsetu varð lógin um rentustuðning til samansparing til sethúsa- og íbúðarbygging broytt.

Upphæddirnar vórðu javnførdar og rentustuðningurin varð hækkaður úr 2 upp í 3%. Á ymsan hátt varð lógin eisini gjørd meira liðilig. Hetta fyri at eggja fólki til at gera nýtslu av møguleikunum í lógini.

Lógin um Húsalánsgrunnin varð eisini broytt í seinastu tingsetu. Millum annað kann grunnurin nú í ávísan mun veita lán til keyp av eldri húsum. Broytingarnar fevndu eisini um serligar sømdir til húskir, ið, orsakað av at rørslutarnað hoyra til húskið, hava serligan tørv á húsavídd.

Í løtuni verður arbeitt við at endurskoða lógina um íbúðargrunnin. Henda lóg hevur ávís brek, sum eru atvoldin til, at lógin ikki hevur virkað eftir ætlan.

Landsstýrið vónar, at uppskot um broytingar í lógini um íbúðargrunnin kann verða lagt fyri tingið í hesi tingsetuni.

Almannamál

Í teim blokkstuðulssamráðingum, danir hava lagt upp til, er ætlað at varðveita refusión á almannaøkinum. Frá føroyskari síðu verður kravt, at tá verða pensiónir og annað meira regluliga javnførdar, so vit ikki aftur koma í ta støðu, at pensiónistarnir gerast gisli í samráðingum við stjórnina.

Vit eru nógv afturútsigld á hesum øki, men loysn tykist ikki møgulig, fyrrenn semja er um broyting í tilskotsskipanini. Samstundis skuldu vit helst fingið eina ATP-skipan í lag.

Samráðst hevur leingi verið um yvirtøku av andveikraverndini og skúlanum á Tróðni, og er støðan her hin sama, at neyðug útbygging verður forðað av spartiltøkum í Danmark og tørvandi semju um samlaðu tilskotsskipanina.

Vit eru tí komin í ta støðu, at løgtingið noyðist at játta einar 3-4 mill. kr. til hetta danska ábyrgdarøki, skal ikki tænastustøðið fyri hesi okkara veikastu ikki søkka heilt í botn.

Farið er spaknliga undir at útbyggja andveikraverndina í smærri eindum, m.a. við bústovnin í Runavík, ætlaðu byggingina í Suðuroy og umlættingarheimið í Klaksvík.

Umhugsað verður at flyta endurbúgvingina frá avlamispensiónslógini og leggja hana undir forsorgarlógina.

Ætlanin er at byggja upp eina skipan við vardum arbeiði á privatum og almennum stovnum og at seta vardar verkstaðir á stovn. Hitt almenna kann so eftir fastari skipan rinda lønariskoyti til slík arbeiðspláss. Hetta vildi givið størri lívsinnihald og meining til teirra, sum manna slík arbeiðspláss, og sam stundis lætt um í avlamispensiónsútreiðslunum.

Røktarheimið í Suðurstreymi er hitt seinasta eftir ætlanini frá sjeytiárunum, tá hetta er liðugt verða tvær sýslur, sum einki ellis- og røktarheim hava.

Landsstýrið hevur tikið avgerð um at byrja í Sandoynni í 1987 og síðan at fyrireika bygging í Norðstreymoy. Her verður bygt út í smærri eindum enn fyrr.

Ætlan um afturatbygging í Eysturoy til rørslubrekað fyriliggur eisini, og verður farið undir hetta, so skjótt løgir eru fíggjarliga, og íløguvirksemið linkar nakað.

Politikkur samgongunnar er annars at hjálpa fólki at búgva heima sum longst og at útbyggja heimahjálpina og veita ansingarstuðul, men at smærri umlættingarheim verða til taks eftir tørvi.

Blindafelag Føroya fer undir bygging av blindaheimi, og verður helst neyðugt við ávísum stuðli frá løgtinginum til hetta, eins og gjørt var fyri Sinnisbata.

Annars er sosiala umsiting landsins ov illa útbygd, og noyðast vit at fremja munandi broytingar av bygnaðinum á Almannastovuni og fara víðari við hugsanunum um sosialar eindir úti um landið.

Almannaøkið er kostnaðarmikið at reka, og er sera óheppið, at vit eru so afturútsigld, júst nú so stórar uppgávur liggja fyri at ratta upp á búskapargongdina.

Men her mugu vit semjast um at gera slík undantøk, at tey, sum mugu hava samskifti við almannaøkið, ikki koma at rinda ein órímiligan pris.

Løgtingssamtyktin um løgtingsins umboðsmann er til viðgerðar í nevnd. Eitt úrslit kundi kanska troðka á, at vit fingu trygd fyri, at fólk fáa tær sømdir, tey eiga.

Familju- og trivnaðarmál

Ávísir tættir í teim broytingum, samráðst hevur verið við danir um á almannaøkinum, eru slíkir, at fæst ikki semja um helvtarbýti her, mugu vit fremja batar, sum føroyski parturin kemur at bera kostnaðin av.

Tað er t.d. ótolandi, at barnsburðarorlovin í Føroyum bert er 8 vikur, meðan hon í Danmark er 20-24 vikur, heldur ikki kann góðtakast, at ójavni er í viðvíkjandi ávirkanini av hjúnafelagainntøku á grundpensiónsupphæddirnar, ella at hjún í Føroyum einans fáa 150% av einari pensión, meðan tey í Danmark fáa munandi meira.

Í samgongusamráðingunum var semja um miðskeiðis í valskeiðinum at endurskoða málsetningin viðvíkjandi størri nýskipanum á almanna- og familjuøkinum.

Eisini var semja um at kanna avleiðingarnar av at geva stuðul til foreldur, sum ansa børnum sínum heima, at skatta hjún við helvtarbýti, at loyva fólki at virka sum heimahjálp hjá sínum egnu og annað.

Landsstýrið hevur økt upplýsingararbeiði viðvíkjandi fylgjunum av rúsdrekkamisnýtslu og vil gjøgnum hjálpargrunnin ímóti rúsdrekkamisnýtslu stuðla viðgerð, sum fáast kann í Føroyum og uttanlands.

Kommunalmál

Landsstýrið vil framhaldandi royna at fremja eina desentralisering og umhugsar flyting av ymsum stovnum úr miðøkinum — við ovurhitaðum virksemi — til tey minni útbygdu økini. Kannað verður eisini, um partar av umsitingararbeiðinum kunnu leggjast út til kommunalar eindir.

Ein byrjan í hesum arbeiði eru líkningardeildirnar úti um í landinum. Í hesum døgum byrja deildirnar í Norðoyggjum og Suðuroy virki sítt, og komandi ár fara fleiri í gongd.

Nevnd er sett at endurskoða byggi- og býarskipanarviðurskiftini, og landsstýrið fer at virka fyri at fáa stovnsett eina veruliga landsplanlegging, sum upp á longri sikt tekur sær av yvirordnaðu planleggingini.

Slíkt arbeiði er munandi meira umfatandi enn vanlig byggi- og býarfyriskipan er, tí her koma umhvørvisspurningar og so mangt annað uppí.

Heilsuverkið

Gongd er framvegis ikki komin á úthyggingarnar av teimum trimum sjúkrahúsunum, sum yvir 10 ár er mett at kosta 225 mill. kr.

Neyvan fer stórbygging í gongd, fyrr enn stuðulssamráðingarnar eru loknar, væntandi síðst í hesum árinum ella fyrru helvt av komandi ári.

Tó kunnu vit rokna við at noyðast at gera neyðugar nýgerðir og umvælingar í komandi fíggjarári, millum annað á Klaksvíkar sjúkrahúsi (ventilatión v.m.)

Samtykt er at seta nevnd at kanna møguleikan fyri at seta kommunulæknarnar við fastari løn, og hvørjar fylgjur henda broyting fær fyri verandi sjúkrakassaskipan.

Semja er fingin við læknafelagið, at setast skuldu 2 kommunulæknar á Sandi, og byrja hesir at virka frá 1. august 1986.

Hjálparamboðsmiðstøðin fer at virka til heystar.

Skúli og undirvísing

Fyri at fáa so tíðarhóskandi undirvísingartilfar á føroyskum í øllum landsins fólkaskúlum og í framhaldsskúlunum, so er játtanin á fíggjarlógini munandi økt.

Uppskot varð lagt fram í undanfarnu tingsetu um keyp av húsum til landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð, men aftan á nevndarviðgerð varð samtykt at

finna betri háskandi høli, og væntandi kemur uppskot aftur á ting í næstum hesum viðvíkjandi.

Tað eru 3 ár liðin, síðan lógin um frítíðarundirvísing v.m. kom í gildi, men enn virkar hon ikki eftir ætlan vegna vantandi reglur og kunngerðir, hóast tað hevur verið møguligt at framt lutvísa undirvísing eftir lógini uttan nakra beinleiðis kunngerð.

Síðan lógin kom í gildi, hava fleiri feløg og felagsskapir strongt á at fáa tann partin av lógini, ið viðvíkur frítíðarvirksemi, settan í verk. Uppskot til kunngerð hevur verið til hoyringar hjá øllum bý- og bygdaráðum í Føroyum, Føroya Kommunufelag, ymsum ungdóms- og øðrum felagsskapum og Í.S.Í. til ummælis, og væntandi kann kunngerð um frítíðarvirksemi koma í gildi í næstum.

Hóast drúgv tíð er liðin, síðan álit um fiskivinnuútbúgving varð gjørt, og royndir hava verið gjørdar við hesum, so er henda útbúgving ikki komin í fasta legu, men nú verður miðað ímóti at fáa hesa undirvísing á stovn í komandi fíggjarári. Somuleiðis við sjóvinnuskúla.

Málið um tekniska skúla í Klaksvík og handilsskúla á Kambsdali varð avgreitt í farnu tingsetu, men enn vantar endaliga viðgerð hjá fólkatingsins fíggjarnevnd, sum hevur fund um hálvan august.

Fróðskaparsetrið

Undir samgongusamráðingunum varð dentur lagdur á at menna setrið sum hægri lærustovn, skapa møguleika fyri gransking og fara undir ymsar hægri útbúgvingar.

Nevndin, sum varð sett at gera uppskot hesum viðvíkjandi, hevur greitt álit úr hondum í juni í ár, og verður tað tikið til viðgerðar saman við fíggjarlógini fyri 1987.

Arbeiðsmarknaðarmál

Nýggj lóg um frítíð við løn varð avgreidd í seinastu tingsetu. Eftir trimum árum verður frítíðin longd úr fýra upp í fimm vikur og frítíðarprosentið hækkað úr 9½ upp í 12%.

Í løtuni verður arbeitt við at endurskoða lógina um trygdargrunn veiðumanna. Endamálið við hesum arbeiði er at broyta lógina soleiðis, at løntakarar á landi eisini fáa trygd fyri 90% av teirri løn, teir eiga tilgóðar, tá og um arbeiðsgevari fer av knóranum. Uppskot um hetta verður lagt fyri løgtingið í hesi tingsetuni.

Í sambandi við hetta arbeiðið verður eisini kannað, hvussu vit kunnu skipa og umsita eina møguliga minstulønarskipan fyri fólk í fiskiídnaðinum. Tá ið hesar kanningar eru lidnar, verður spurningurin viðgjørdur í landsstýrinum og støða tikin til, um landsstýrið skal koma við lógaruppskoti á hesum øki.

Eftir fastlagdari ætlan verður arbeiðseftirlitið útbygt við deildum kring landið. Í ár er ein deild sett á stovn í Norðoyggjum. Komandi ár verður deild sett á stovn í Suðuroy. Og tey næstu árini tvær deildir settar á stovn, ein fyri Eysturoy og ein fyri Vágar og Norðstreymoy

Arbeiðsumhvørvisráðið er valt. Landsstýrið umhugsar í løtuni, um ráðið skal hava aðra samanseting, og um tað sostatt skal veljast av nýggjum. Millum annað skal arbeiðsumhvørvisráðið gera uppskot til arbeiðsumhvørvislóg. Starvið sum arbeiðsmedisinari verður væntandi sett fyrst í komandi ári.

Í størri og størri mun skipar arbeiðseftirlitið fyri skeiðum, ið hava til endamáls at bøta um trygdina á okkara arbeiðsplássum.

Arbeiðið í javnstøðunevndini eigur at verða uppaflurtikið, og verður nevndin nú vald av nýggjum.

Samgongumál - Kommunikatión

Tann partin av samgongumálum, ið landsverkfrøðingsskrivstovan fyriskipar, hevur hon lýst at seta nágreiniliga í fylgiskjølum til hesa røðu.

Men vert er at strika undir, at nú ert bert tvær bygdir eftir, sum ikki eru sambundnar við restina av landinum; tær eru Múli og Gásadalur, men finna hesi mál loysn í hesum valskeiði.

Eisini er vert at draga fram, at nú eru útlit til, at samferðsluviðurskiftini við Sandoynna tykjast at fáa eina varandi loysn.

Bergholsgerð samgongunnar, ið onkur heldur sampakkar illa við búskaparstýringina, verður so framd kortini. So mikið størri afturhald verður so at sýna í øðrum samferðsluútbyggingum. T.d. er endalig støða enn ikki tikin til viðari havnabygging.

Landsverkfrøðingurin Mikkjal Helmsdal, sum eigur so stóran leiklut í samfelagsútbyggingini seinastu 40 árini, leggur nú frá sær vegna aldur. Í hesum sambandi verður umhugsað, um broytingar skulu gerast í bygnaðinum av stovninum, sum er vorðin sera fjølbygdur.

Eigur eitt sundurbýti og ein ávís desentralisering at fremjast her, ella skal stovnurin rekast á sama hátt sum áður.

Útreiðsluvøksturin innan Strandferðsluna og Bygdaleiðir hevur verið sera stórur seinnu árini, og mugu vit álvarsliga kanna møguleikarnar fyri rationaliseringum á hesum økjum. Skal hetta gerast uttan at skerja tænastustøðið - sum neyvan er ov høgt — má verulig nýhugsan vinna fram.

Allir tankar um privatisering hava víst sína ómegd, tær royndirnar gjørdu bert raksturin uppaftur dýrari.

Ynskjandi var, at tyrlutænastan kundi verið útbygd, serliga millum Vágoynna og tey fjarastu økini, men bert ein neyv viðgerð uv figgjarlógaruppskotinum kann avgera, um hetta er møguligt.

Flogmálið má loysast í komandi løgtingsetu, tí nútíðarsamfelagið krevur bætta servisu á hesum øki. At vit skulu nýta 3 samdøgur fyri at greiða eini ørindi uttanlands, er ikki nútíðarhóskandi, henda tíð má styttast niður í 1-1½ samdøgur við at leggja flogtíðirnar øðrvísi. Í hesum sambandið við Vágoynna at umhugsa av álvara.

Týðandi eyðkenni fyri framkomin samfeløg er telenýtslan. Her er talan um vanliga telefonnýtslu, telex, telefax og teldusamband, og í seinastuni slíkt samband yvir fylgisveinar.

Vit eru í ávísan mun eftirbátar á hesum øki, eitt nú í útbúgving av elektroniklærlingum.

Fimm ára ætlanin, sum løgtingið samtykti í vár, er sett í verk, og er her serliga talan um:

1. Útbygging av telefonnetinum og partvísa digitalisering.
2. Nordisk Mobil Telefon fyri Føroyar sum virkandi partur av NMT-skipanini í hinum norðurlondunum.
3. Fylgisveinastøð á Húsareyni, at tryggja telesambandið millum Føroyar og útheimin. Her verður ikki útbygt til sjónvarpsmóttøku, sum onkur hevur hildið, men slík kann skoytast uppí, um samfelagsligur tørvur gerst á henni.
4. Nýggjur 200 kW útvarpssendari á Skúvanesi í Suðuroynni. Í hesum sambandi er endaligt útboðstilfar sent út.

Ein trupulleiki, telefonverkinum er fyri, er tørvurin á arbeiðsmegi, og hetta hóast verkið í fleiri ár hevur havt eitt minkandi lutfall millum talið av starvsfólki og telefonfeløgum.

Mentunarmál

Fjølmiðlavøksturin gongur við risaferð í londunum uttanum okkum, og serliga verða tað fylgisveinasendingar, sum fáa ávirkan á fjølmiðlavirksemið her heima og gerast avbjóðing fyri hetta virksemi.

Hvussu vit fóta okkum mentunnarliga undir hesum broytingum, sum vit ikki kunnu útihýsa, verður neyðugt at semjast um.

Ein hin mest týðandi táttur í hesum spurningi er, hvussu vit leggja kósina í útbyggingina av Sjónvarpi Føroya, men eisini umstøður útvarpsins og blaðanna fáa týdning í hesi mentunnarligu kollveltingartíð.

Føroysk luttøka í norðurlendskum samstarvi hevur verið rættiliga tilvildarlig, og hava vit onga veruliga umsiting hesum viðvíkjandi. Serligan týdning má mentannarsamstarvið metast at hava, og mugu vit skipa so fyri, at landsumsitingin fær høvi til at seta orku av til hesar uppgávur serliga.

Føroysk luttøka veitir okkum innlit, nýggja vitan, hugskot, ávirkan og í einstøkum førum norðurlendskan stuðul til føroysk mentanartiltøk. Hin vegin eiga vit eisini okkurt at lata øðrum, so sum gransking í søgu og fólkalívsfrøði, havgransking, bókmentir, list, kvæði o.a.

Landsstýrið fer undir fíggjarlógarviðgerðini álvarsliga at kanna fíggjarorkuna til at skipa hetta samstarv dyggiligari.

Eitt serligt mentanarligt varðveitingararbeiði er orðið bráðneyðugt, og er tað umvælingin av Kirkjubømúrinum. Mett er, at kostnaðurin av varðveitingararbeiðnum er umleið 3 mill. kr.

Fyribils er avsett 1. mill. kr., og má nú kannast, hvussu frestandi peningurin fæst til vega.

Sambært uppskot í løgtinginum verð í ár broyting gjørd í møguleikum mentunmargrunsins at stuðla føroyskum rithøvundum, soleiðis at løn kann vantast slíkum eitt tíðarskeið, meðan arbeitt verður við ávísum skapandi arbeiði.

Serligi tátturin í norðurlendskum samarbeiði sum tingmannaráð útnorðurs er, fer helst eisini at ríka okkum á mentannarliga økinum.

Ríkisstuðulin

Sum frábeðað í fjør, er farið undir samráðingarnar um broyting í ríkisstuðlinginum. Hesar eru komnar væl ávegis. Eftir eitt samráðingarumfar á politiskum stigi, har roynt var at semjast um siktið í samráðingunum, eru nærri kanningar framdar á embætismannastigi.

Dentur verður lagdur á at finna fram tey øki, har Føroyar eru vorðnar eftirbátur, tí stjórnin ikki hevur framt ábøtur, so leingi føroyingar ikki vildu samráðast um at leggja part av stuðlinum um til blokkstuðul, síðan at avtalur kunnu fáast um framtíðar íløgur á økjunum, sum eru felagsmál, og ikki minst at finna fram ein hóskandi reguleringslykil.

Sum væntað, skjýtur núsitandi stjórnin upp, at munandi størri partur av stuðlinum fer í blokkin, so teir, sum noktaðu at samráðast, mugu nú góðtaka stór frávik frá 1979-uppskotinum.

Realpolitiskt er eingin onnur leið enn at fáa skilabestu loysnina á hesum máli skjótast gjørligt, tí sum er, eru tað tey veikastu í okkara samfelag, sum rinda prísin av fastfrystingini av ríkisstuðlinum.

Undirgrundin

Samráðingarnar um undirgrundina eru munin tyngri. Stjórnin tykist sera bangin fyri broyting í avgerðarrættinum viðvíkjandi undirgrundini.

Kortini skal loysn finnast, og mugu vit sannføra danir um, at alt annað enn endaligur føroyskur avgerðarrættur í hesum máli er óverdug og ótolandi støða, tá ið hugsað verður um tey kort, vit hava á hondum.

Hitt at tryggja donsk áhugamál og rættindi í eini praktiskari undirgrundsavtalu, í samband við at málsøkið gerst føroyskt sermál, er nógv einfaldari mál at loysa, so her nýtist dønum ikki at óttast.

Grindadráp

Stríðið fyri at verja rætt okkara at umsita náttúrurikidømi okkara, millum annað tann av Gudi givna møguleika at drepa grind, hevur leikað hart á seinasta árið.

Broytingin í drápsháttinum, vit heppið fingu framda, sannfurir um, at vit koma at vinna hetta stríð.

Eitt arbeiðsár

Stevið í samgonguni er nú eitt og eitt hálvt ár eftir landsstýrisskipanini vorðið rættiliga gott, og hevur landsstýrið tí góðar vónir um fruktagóð úrslit í komandi tingsetu.

Hetta tingárið »mitt ímillum valini« skuldi kunna roynst hitt sakliga sterkasta, tí valhugsan ørkymlar ikki, og setningurin er settur greitt upp í samgongugrundarlagnum.

Andstøðan má eisini gera sær greitt, at hetta grundarlag fyriliggur, men júst tí so leingi er til val, skuldi eisini hon sakliga kunna lagt upp í kjakið og viðgerðina fyri at fingið hitt frægasta samlaða úrslitið.

Vit politikkarar hava fingið ta ábyrgd við avgerðum okkara at ávirka gongdina í samfelagnum, at broyta ella varðveita, at lætta um dagliga strevið ella leggja neyðugar byrðar á.

Vónandi sýna bæði andstøða og stjórnarflokkar hegni til at taka hepnar samfelagsavgerðir í hesi tingsetu.

Eykatingseta

Ár 1987, fríggjadag 29. mai kl. 01.50 varð løgtingið sett.

Eftir dagsskrá kom til viðgerðar:

Løgmaður legði fram tingmál nr. 143/86: Loysn av arbeiðsósemju.

Formaðurin bað um loyvi at víkja frá tíðarfreistini til viðgerð av framlagda máli. Jógvan Sundstein bað um, at atkvøðugreiðsla fór fram um hetta.

Næsti fundur varð settur 29. mai kl. 02.10.

Við 22-0 atkvøðum varð loyvi at frávíkja tíðarfreistini givið.

Fýra fundir vórðu hildnir aftrat, nevniliga kl. 02.10, 06.30, 06.40 og 07.10. Løgtingsmálið nr. 143: Loysn av arbeiðsósemju varð samtykt við 17-0 atkvøðum, og tingsetan varð síðani slitin.

Farloyvi

Ár 1986, ólavsøkudag var við 28-0 atkvøðum samtykt, at Hans Jacob Debes, Tórshavn, skuldi taka sæti á tingi fyri Erlend Patursson, løgtingsmann, sum andaðist 16. juni.

22. september var við 21-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge skuldi taka sæti á tingi fyri Poul Michelsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

24. september var við 21-0 atkvøðum samtykt, at Páll Josephsen skuldi taka sæti á tingi fyri Asbjørn Joensen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna almenn ørindi uttanlands 7 dagar.

28. oktober var samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sæti á tingi fyri Jóannes Dalsgaard, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð 7 dagar.

4.november var við 21-0 atkvøðum samtykt, at Kári Petersen skuldi taka sæti á tingi fyri Thomas Arabo, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð í almennum ørindi.

5. november var við 18-0 atkvøðum samtykt, at Dánjal Pauli Danielsen, Vellastø, skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna almenna vitjan í Suðurafrika.

17. december var við 21-0 atkvøðum samtykt, at Dánjal Pauli Danielsen, Velbastað, og Ólavur Heinesen, Leirvík, skuldu taka sæti á tingi fyri ávíkavist Óla Breckmann og Jørgen Thomsen, løgtingsmenn, sum í skrivum bóðu um farloyvi ávíkavist vegna fólkatingsarbeiði og sjúku.

29. januar 1987 var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Dánjal Pauli Danielsen skuldi taka sæti á tingi fyri Eliesar Arge, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð í vikunum 5 og 6.

5. februar var við 19-0 atkvøðum samtykt, at Juul Jacobsen skuldi taka sæti á tingi fyri Tord Niclasen, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð frá d.d.

18. februar var við 23 0 atkvøðum samtykt, at Sigfríður Vørðhamar, Fuglafirði, skuldi taka sæti á tingi fyri Olaf Olsen, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð í minst eina viku.

10. mars var við 20-0 atkvøðum samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sæti á tingi fyri Jákup Lindenskov, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð 10-17. mars.

18. mars var við 21-0 atkvøðum samtykt, at Ólavur Heinesen, Leirvík, skuldi taka sæti á tingi fyri Jørgen Thomsen, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúkraviðgerð.

Sama dag var við 23-0 atkvøðum samtykt, at Kári Petersen, Innan Glyvur, skuldi taka sæti á tingi fyri Thomas Arabo, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð í almennum ørindum. Ivan Johannesen spurdi, hvørji almenn ørindi Thomas Arabo hevði. Formaðurin svaraði, at tað framgekk ikki av brævinum.

31. mars var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Ingrid Sondum, Velbastað, skuldi taka sæti á tingi fyri Karin Kjølbro, løgtingslim, sum í skrivi bað um farloyvi vegna útbúgvingarørindi uttanlands í 14 dagar.

3. apríl var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Dánjal Larsen, Tórshavn, skuldi taka sæti á tingi fyri Pauli Ellefsen, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna privat ørindi uttanlands 3.-10. apríl.

29. mai var við 26-0 atkvøðum samtykt, at Ólavur Heinesen, Leirvík, Dánjal Pauli Danielsen og Hilmar Bech skuldu taka sæti á tingi fyri ávíkavist tingmenninar Jørgen Thomsen, Óla Breckmann og Sverra Midjord, sum í skrivum bóðu um farloyvi vegna ávíkavist uttanlandsferð frá 23. mai, fólkatingsarbeiði og uttanlandsferð.

Tingnevndir

Valdar 31. juli 1986

Figgjarnevndin

Fastir limir: Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg og Flemming Mikkelsen.

Tiltakslimir: Jákup Lindenskov, Hergeir Nielsen, Hilmar Kass, Heini O. Heinesen, Johs. M. Olsen, Poul Michelsen og Pauli Ellefsen.

Marknaðarnevndin

Fastir limir: Henrik Old, Hilmar Kass, Karin Kjølbro, Hergeir Nielsen, Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen, Olaf Olsen.

Tiltakslimir: Tórálvur Mohr Olsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Hans J. Debes, Anfinn Kallsberg, Jógvan Olsen, Eyðun Viderø.

Fiskivinnunevndin

Fastir limir: Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Kass, Tordur Niclasen, Signar Hansen, Jógvan I. Olsen, Olaf Olsen, Ivan Johannesen.

Tiltakslimir: Henrik Old, Asbjørn Joensen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Eilif Samuelsen, Svend Aage Ellefsen og Agnar Nielsen.

Landsstýrismálanevndin

Hergeir Nielsen, Óli Breckmann, Tummas Arabo.

Landbúnaðarnevndin

Henrik Old, Øssur av Steinum, Heini O. Heinesen, Eyðun Viderø og Jógvan Olsen.

Samferðslunevndin

Tórálvur Mohr Olsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Heini O. Heinesen, Eyðun Viderø, Johs. M. Olsen, Svend Aage Ellefsen.

Umhvørvisnevndin

Jóannes Dalsgaard, Hans Jacob Debes, Øssur av Steinum, Poul Michelsen og Johs. M. Olsen.

Rættarnevndin

Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Hans J. Debes, Jógvan Sundstein, Eilif Samuelsen.

Skattanevndin

Poul Jacob Olsen, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen.

Almanna- og heilsunevndin

Jákup Lindenskov, Tordur Niclasen, Karin Kjølbro, Jógvan Sundstein, Flemming Mikkelsen.

Menta- og skúlamálanevndin

Jóannes Dalsgaard, Asbjørn Joensen, Hergeir Nielsen, Óli Breckmann, Eilif Samuelsen.

Umboð í Norðurlanda Ráðið

Fastir limir: Karin Kjølbro og Jógvan Sundstein.

Tiltakslimir: Hans Jacob Debes og Annfinn Kallsberg.

Tingmannaráð Útnorðurs

Fastir limir: Tummas Arabo, Hans Jacob Debes, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Jógvan Sundstein og Agnar Nielsen.

Tiltakslimir: Jóannes Dalsgaard, Karin Kjølbro, Hilmar Kass, Tórálvur Mohr Olsen, Anfinn Kallsberg og Pauli Ellefsen.

1. oktober vórðu hesi vald (løgtingsmál nr. 2: **Val av álitismonnum og nevndum**).

Umboðsmaður á aðalfundi hjá Flogsamband Føroya

Jákup Lindenskov.

Í stýrið fyri Føroya Listasavn

Frits Johannesen, Fuglafirði, Maud Benjardøgg, Vági, Jacob Fuglø, Hvalvík.

Sum grannskoðari í Føroya Sparikassa

Jona Henriksen, Tórshavn.

Í stýrið fyri Føroya Vanlukkutrygging

Fastir limir: Tórhallur Patursson, Tórshavn, Jákup Birgir Mohr, Sandi, Flemming Mikkelsen, Vági.

Tiltakslimir: Elinborg T. Johansen, Tórshavn, Eyðolf Dimon, Tórshavn og Eilif Samuelsen, Tórshavn.

Grønlandsfelagið

Fastir limir: Heðin Klein, Tórshavn, Poul J. Olsen, Klaksvík og Eilif Weihe, Sørvági.

Tiltakslimir: Esmund Jacobsen, Klaksvík, Niclas Mikkelsen, Sydrugøtu og Suni Jacobsen, Sørvági.

Húsalánsgrunnurin

Fastir limir: Johan Mortensen, útvarpsmaður, og Benny Samuelsen, báðir Tórshavn.

Tiltakslimir: Niclas Mikkelsen, Sydrugøtu, og Ivan Johannesen, Miðvági.

Íleggingargrunnin

Hilmar Bech, Porkeri, og Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur, Tórshavn.

Kirkjustjórnin

Súni í Hjøllum, Toftir, Torkil Beder og Agnar Nielsen, Vestmanna.

Í kong Chr. X og dr. Alexandrines legat

Olanta Hansen, Klaksvík.

Umboð í Landsbanka Føroya

Útsett.

Mentagrunnur Føroya Løgtings

Útsett.

30. oktober valdi Sambandsflokkurin sínar limir:

Fastur limur: Eilif Samuelsen og Ivan Johannesen, varalimur.

Umboðsmaður á aðalfundi hjá Skipafelagnum Føroyar:

Fastur limur: Hans Tausen Olsen, Runavík.

Varamaður: Kári Petersen, cand. polyt., Innan Glyvur.

Umboðsráðið fyri Tryggingarsambandið Føroyar:

Hildur Patursson, Hoyvík, varð vald í staðin fyri Erlend Patursson, sála.

Nevndin viðv. gerð av lóg um løgtingsins umboðsmann:

Jógvan Sundstein boðaði frá, at hann tók sæti í nevndini í staðin fyri Demmus Hentze.

(Sambandsflokkurin varð biðin um at velja lim í staðin fyri Trygva Samuelsen).

Serliga tingnevndin at viðgera løgtingsmál nr. 31:
Heimastýrisskipanin varð 6. november 1986 vald soleiðis:
Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen, Hans Jacob Debes, Jørgen Thomsen, Tordur Niclasen, Adolf V. Hansen og Hilmar Kass.

Ár 1987, týsdagin 14. apríl varð løgtingsmál nr. 140: *Val av álitismonnum og nevndum (1987) viðgjørt. Hesi vórðu vald:*

Umboðsmaður á aðalfundi hjá Flogsambandi Føroya:
Hergeir Nielsen.

Føroya Brunatrygging
Fastir limir: Viljormur Patursson, Tórshavn, Haldor Hansen, Tórshavn og Páll Vang, Tvøroyri.
Tiltakslimir: Jan Müller, Tórshavn, Eiffinn Stóra, Skopun og Harry á Lakjuni, Fuglafirði.

Føroya Listasavn
Frits Johannesen, Fuglafirði, Maud Benjardøgg, Vágur, og Jacob Fuglø, Hvalvík.

Grannskoðari í Føroya Sparikassa
Jona Henriksen.

Føroyskt Kirkjumál
Svenning Tausen, Tórshavn, Hákun Djurhuus, Tórshavn.

Grønlandsfelagið
Valið útsett.

Jólamerkjalegatið
Elisabeth Nielsen, Vágur.

Landsbanki Føroya
Valið útsett.

Landsskattanevnd
Vað vald í apríl 1985, men í staðin fyri Eyðun Viderø er nú Oddfríður Gregersen valdur.

Lønarráðið
Valið útsett.

Menningargrunnurin
Valið útsett.

Mentannargrunnurin
Valið útsett.

Realkredittstovnurin
Zacharias Müller, Porkeri, Jákup Mortensen, Tvøroyri.

Umboðsmaður á aðalfundi í Sjóvinnubankanum
Kári Petersen, Innan Glyvur, tiltakslimur Dánjal Andreasen, Leirvík.

Nevndarlimur í Skipafelagnum Føroyar
Martin Joensen, Hvítanes og Dánjal P. Danielsen, Velbastað.

Umboð á aðalfundi í Skipafelagnum Føroyar
Hans Tausen Olsen, Runavík, tiltaksmaður Jóhan Magnussen, Miðvágur.

Yvirpolitirættirin
Fastir limir: Kári D. Petersen, Tórshavn, og Jákup Páll Nielsen, Tórshavn.
Tiltakslimir: Trygvi Jacobsen, Tórshavn, Poul Hansen, Tórshavn.

1. Rættargangslógin

Ár 1986, fríggjadagin 1. august legði rættarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði hetta málið fram hin 20. februar 1986 (tingmál nr. 70/1985). Við fyrstu viðgerð hin 13. mars varð tað beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin legði málið fram aftur hin 21. mars við uppskoti til samtyktar um at gera rættarnevndina til millumtinganevnd til tess at koma við áliti á ólavsøku.

Rættarnevndin hevur havt fýra fundir har Kirsten Kemp, fulltrúi á ríkisumboðsskrivstovuni, sum hevur verið skrivari hjá arbeiðsbólkinum, ið hevur endurskoðað rættargangslógina, hevur verið vegleiðari hjá rættarnevndini.

Nágreiniligar frágreiðingar eru frá hesum fundum, og tær liggja í sjálvum málinum.

Rættargangsmál eru í heimastýrislógini hvørki nevnd undir lista A ella lista B.

Í tí arbeiðsbólki, ið hevur endurskoðað rættargangslógina, hevur landsstýrið verið umboðað av skrivstovustjóranum. Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið, og tað er ein samd rættarnevnd, ið sum heild tekur undir við hesum uppskoti við smærri broytingum.

Serliga verður tikið undir við, at rættarviðgerðin eftir broyttu lógini verður munandi einfaldari og liðiligari. Millum annað kemur hetta at føra við sær styttri bíðitíð við at fáa mál fyri rættin.

Samstundis sum rættarnevndin vísir til sjálvt uppskotið frá Føroya landsstýri, har 15 serlig málsøki í rættargangslógini verða umrødd, vilja vit stutt nema við fýra øki, ið hava principiellan týdning. Talan er um:

1) lokalnevndir,
2) 1 dómsmansformin,
3) avtøku av serliga fyribrigdinum um fólk, ið ikki hava juridiska útbúgving, ið hava kunnað virkað sum verjar, og
4) rættarmálið.

Ad 1): Lokalnevndir vórðu innførdar í Danmark í 1981. Endamálið hjá hesum nevndum er at útbyggja sambandið millum løgregluna og fólkið og at viðgera klagur yvir framferðina hjá løgreglumonnum í tænastuni. Í samband við málsviðgerðir av hesum slag eru tríggir møguleikar: Burturvísing, nærri kanning av málinum hjá einum hægri myndugleika innan ákæruvaldið ella nærri kanning av málinum í rættinum. Mælt verður til, at vit fáa slíkan stovn í Føroyum.

Mælt verður til, at í slíkari lokalnevnd í Føroyum skulu sita: Fútin, tvey starvsfólk, ið starvast á fútaskrivstovuni og vald millum starvsfólkið har og fýra løgtingsumboð.

Føroya landfúti hevur gjørt eitt notat um spurningin um lokalnevnd, ið liggur í málinum.

Ad 2): Dómsmansdómurin er ókendur í Føroyum, burtursæð frá krígsárunum. Dómsmenn eru leikmenn og koma fyri í danskari rættarsøgu heilt aftur til ár 1000. Við grundlógini (1849) varð avgjørt, at leikdómarar skuldu varðveitast í samband við revsimál í Danmark.

Eftir donsku rættargangslógini eru tríggir háttir at viðgera revsimál uppá.

1) Vanligar politisakir, ið verða avgjørdar av dómaranum einsamøllum.
2) Dómsmannastovnurin, ið er ein dómari og tveir leikdómarar.
3) Nevningadómsstólur, sum er ein dómari og 12 nevningar. (Hesa skipan hava vit í Føroyum).

Dómsmannsstovnurin kann sigast at vera kostnaðarmikil og trupul. Á fyrsta rættarstigi eru tveir dómsmenn.

Hetta er tíðarkrevjandi. Her eru fólk, ið ikki hava kunnleika til rættarskipanina, og sum ikki kenna revsilógina. Dómarin skal tí vegleiða dómsmenninar um, hvat ið tað er, ið málið snýr seg um, og hvat ið støða skal takast til.

Í Danmark eru dómsmannsstovnurin víðkaður seinastu árini. Hóast hetta er í tráð við tíðarinnar anda, hevur arbeiðsbólkurin ikki hildið, at hendan skipan eigur at verða sett í verk í Føroyum.

Ad 3): Tað er eitt serføroyskt fyribrigdi, at fólk hava kunnað virkað sum verjar í Føroya rætti uttan at hava løgfrøðiligt embætisprógv. Hetta var hent ta tíð, ið nærum ella bert løgfrøðingar vóru. Arbeiðsbólkurin hevur mælt til at avtaka hesa skipan, tí at hesin tørvur ikki er til staðar í dag. Í dag eru fleiri advokatar at velja ímillum.

Áðrenn farið verður undir 4) skal gerast vart við, at alt uppskotið, áðrenn ta varð lagt fyri tingið, var til ummælis hjá Føroya advokatfelag. Advokatfelagið hevur ikki svarað aftur, og tað verður tikið sum prógv um, at tey einki hava at mótmæla viðvíkjandi uppskotinum.

Ad 4): Bæði í galdandi rættargangslóg og í høsari, ið er í uppskoti, stendur »retssproget er dansk og færøsk«.

Í heimastýrislógini § 11 stendur soljóðandi:

> »Færøsk anerkendes som hovedsproget; men dansk skal læres godt og omhyggeligt, og dansk kan lige så vel som færøsk anvendes i offentlige forhold.
> **2. pætti.** Ved forelæggelse af appelsager skal der medfølge dansk oversættelse af alle akter på færøsk«.

Við hesum í huga hevur rættarnevndin vent sær til Sjúrð Rasmussen, cand. jur., í landsstýrinum og biðið hann greiða nærri frá:

- Rættarstøðuni hjá føroyska rættarmálinum í dag
- Um nakrar løgfrøðiligar fordingar eru fyri at veita føroyska rættarmálinum betri sømdir, og
- at gera uppskot til broytingar í rættargangslógini, § 149, soleiðis at føroyskum verður veitt best møguligar sømdir innanfyri karmarnar av heimastýrislógini, § 11, og annars hvat starvsliga er møguligt.

Sjúrður Rasmussen hevur latið frá sær umsøgn (responsum) í hesum spurningi, ið limir í rættarnevndini hava fingið eintak av. Eftir hesum er einki til hindurs fyri, at málið í Føroya rætti verður føroyskt. Í endaliga uppskotinum kemur so statt at vera broytingaruppskot um føroyskt sum rættarmál í Føroya rætti, tó soleiðis at danskt kann nýtast av persónum, sum ikki duga føroyskt. Rættarmálið í landsrætti og hægstarætti verður danskt, tó kann føroyskt verða nýtt á hesum stigi, um rætturin heldur seg hava hin neyðugu kunnleika til føroyskt. Mælt verður til, at hesar málsligu broytingar í rættargangslógini koma í gildi eini tvey ár, eftir at tær eru samtyktar, til tess at fólk fáa høvi til at venja seg við at brúka føroyskt.

Eisini verður uppskot um at veita Fróðskaparsetri Føroya peningaliga játtan til at gera orðalista við føroyskum rættarorðum og at skipa fyri skeiði til endurbúgving av fólki á dómara-, fúta- og løgregluskrivstovum um at skriva føroyskt rættarmál.

Eisini verður uppskot um, at tiknar verða upp samráðingar við løgmálaráðið um, at gjørd verður ein tilevningarskipan, soleiðis at føroyskir løgfrøðingar, sum eru skikkaðir, í størri mun verða settir í starv á sorinskrivara- og fútaskrivstovuni, so hvørt sum fleiri verða útbúnir á hesum øki.

Nevndin hevur fingið áheitan frá fulltrúunum við løgfrøðiligum embætisprógvi á landsskrivstovuni um, at tað at arbeiða sum fulltrúi í landsstýrinum kann telja við sum 2 ára starvsroyndir, tá søkt verður um sakføraragóðkenning. Nevndin hevur ta áskoðan, at arbeiði sum fulltrúi í landsstýrinum er so fjøl-

broytt, bæði hvat viðvíkur lógararbeiði, fyrisitingarligum arbeiði og luttøku í bankaforrætningum, at 2 áru virki sum fulltrúi í landsstýrinum saman við einum árs virki sum sakførarafulltrúi gevur fullgott grundarlag at virka sum advokatur.

Ein samd nevnd skjýtur tí upp:

Í Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla fólkatinginum til at gera til lóg uppskot løgmálaráðsins frá 11. februar 1986 um »lov for Færøerne om rettens pleje« við hesum broytingum:

a) Sum nýggj § 1, nr. 27 a verður orðað:

»§ 111, stk. 3 affattes således, gældende fra 1. januar 1989:

»Færøernes politikreds forestås af landfogeden (politimesteren), der skal have bopæl på Færøerne. Landfogedembedet, politiet og sysselmændene anvender i embedsførelsen færøsk sprog, dog kan dansk anvendes af personer, der ikke kan tale og skrive færøsk samt ved henvendelser til personer, der ikke forstår færøsk.«

§ 111, stk. 3, bliver § 111, skt. 4.

b) § 1, nr. 28 verður orðað soleiðis:

»På Færøerne består nævnet af landfogeden (Politimesteren), 2 medlemmer valgt af og blandt personalet på landfogedkontoret, samt fire medlemmer valgt af lagtinget.«.

c) Sum nýggj §1, nr. 34 a verður sett inn:

»34 a. I § 119, stk. 4, indsættes som 2. punktum:

»Den, der har været fuldmægtig ved Færøernes landsstyres ekspeditionskontor, kan medregne ialt 2 års virksomhed i sådan stilling.«

d) Sum nýggj §1, nr. 37 a verður sett inn:

»§ 149 affattes således gældende fra 1. januar 1989:

»§149. Retssproget i sager ved Højesteret og landsret er dansk, dog anvendes færøsk sprog, når retten tiltror sig fornødent kendskab til færøsk.

Stk. 2. Retssproget ved Sorenskriverembedet er færøsk. Dog kan Sorenskriveren, anklagemyndigheden, en advokat, eller en part i sagen anvende dansk, såfremt han ikke kan tale og skrive færøsk. Det samme gælder ved henvendelser til personer, der ikke forstår færøsk.

Stk. 3. Afhøring af personer, der ikke er det danske eller det færøske sprog mægtige, foregår ved hjælp af en af retten udnævnt tolk. Dog kan,

bortset fra straffesager, når ingen af parterne gør fordring herpå og retten tiltror sig fornødent kendskab til det fremmede sprog. Er dommeren ikke det færøske sprog mægtig, foranlediger han, når det måtte være fornødent, tilkaldt en kyndig person til at fungere som oversætter.

Stk. 4. Dokumenter, der er affattede i fremmede sprog, skal ledsages af en oversættelse, der, når retten eller modparten forlanger det, skal bekræftes af en autoriseret translatør eller en af retten antaget oversætter. Oversættelsen kan dog frafaldes, når begge parter er enige derom, og retten tiltror sig fornødent kendskab til det fremmede sprog. Er dommeren ikke det færøske skriftsprog mægtig, foranlediger han dokumenter, affattede i det færøske sprog, oversat. Såfremt oversættelsen ikke godkendes af parterne, skal den bekræftes af en af retten udmeldt kyndig person. I tilfælde af anke eller kære til domstole uden for Færøerne skal dokumenter, affattede i det færøske sprog, ledsages af en oversættelse, foretaget af en dertil af retten beskikket person. Udgifterne ved de i dette stykke omhandlede oversættelser af færøske dokumenter og de i stk. 3 sidste pkt. omhandlede tilkaldelser af tolk udredes af landskassen.«

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta av á næstu fíggjarlóg peningaliga játtan til Fróðskaparsetur Føroya at gera orðalista við føroyskum rættarorðum og at skipa fyri skeiði til endurútbúving av fólki á dómara-, fúta- og løgregluskrivstovunum at skriva føroyskt rættarmál.

III Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið og løgmálaraðið um at taka upp samráðingar um at gjørd verður ein tilnevningarskipan, soleiðis at føroysku løgfrøðingarnir, sum eru skikkaðir, í størri mun verða settir í starv á sorinskrivara- og fútaskrivstovunum, so hvørt sum fleiri verða útbúnir á hesum øki.

Af enda viðmerkir rættarnevndin, at gott hevði verið, um serlig lógarkunngerð varð lýst av »lov om retfærds pleje«, orsakað av at broytingarnar eru so nógvar.

Minnilutin Jógvan Sundstein skjýtur upp soljóðandi broytingaruppskot umfram frammanfyri standandi broytingaruppskot:

IV Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla fólkatingfinum til at gera til lóg uppskot løgmálaráðsins frá 11. februar 1986 um »lov for Færøerne om rettens pleje« við teim av samdari rættarnevnd uppskotnum broytingum umframt at nýggj § 1, nr. 34 b, verður sett inn, sum er soljóðandi:

»I § 131 indsættes som stk. 3.:

»**Stk. 3.** Enhver, der er myndig, har ført en retskaffen vandel og ikke er ude af rådighed over sit bo, kan på Færøerne udføre retssager for andre. De i §§ 133, 134 og 136 indeholdte regler finder med de lempelser, der følger af forholdets natur, anvendelse på sadanne personer, der udfører retssager for andre som erhverv.«

1. viðgerð 2. december. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl 1987 legði fram soljóðandi

Uppiskoytisálit

Málið varð undir 1. viðgerð beint aftur í rættarnevndina.

Undir nýggju viðgerðini av málinum hevur nevndin frá landsstýrinum fingið frásøgn um, at løgmaður 9. oktober 1987 hevur samrádst við løgmálaráðharran um uppskot I frá nevndini. Úrslitið av samráðingunum er, at landsstýrið mælir til:

ad a: Í staðin fyri at seta nýtt stk. 3 til § 113 verður skrivað í viðmerkingum til lógina, at miðað verður ímóti, at føroyskt verður brúkt í storri mun enn nú, soleiðis at tað í rættarstovunum verða sett fólk, so langt tað letur seg gera, sum duga bæði føroyskt og danskt. Eisini eigur tað at vera so, at landfútaembætið og sorinskrivaraembætið eftirkanna fráboðanir, stevn-

ingar o.t. í samband við málsviðgerðir, soleiðis at hesi skjøl verða skrivað í tveimum málum ella í tí málinum, sum móttakarin verður hildin at vera mest kønur í.

ad b: Í staðin fyri orðini »personalet på landfogedkontoret« verður sett »politipersonaleti politikredsen«, tí í nevndini eiga eisini onnur fólk innan løgregluna, enn tey sum eru á landfútaembætinum at kunna gerast limir, tí klagað kann eisini verða um tey. Eisini eiga teir løgtingsvaldu limirnir at vera løgtingsmenn, teir eru jú fólkavaldir.

ad c: Eftir viðlagda skrivi frá løgmálaráðnum dagfest 4. mars 1986 sigur løgmálaráðið seg sinnað at geva fulltrúum undir landsstýrinum somu rættindi at fáa tænastutíðina roknaða í tíðina sum krevst at fáa góðkenning sum advokatur, sum fulltrúar í donsku miðstøðufyrisitingini í kommunonum í Danmark hava.

Mælt verður til, at góðkenna hesa skipan og ikki at seta nýggja § 34 a í lógina.

ad d: Í samsvar við heimastýrislógina er føroyskt høvuðsmálið og verður tí mælt til, at § 149, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»Hovedsproget i retten er færøsk, men dansk kan ligesavel anvendes som færøsk«.

Nevndin tekur undir í hesum.

Vísandi til viðmerkingarnar frammanfyri, mælir ein samd nevnd løgtinginum at samtykkja

I Uppskot

til

samtyktar

a. § 1, nr. 28, verður orðað soleiðis:

»På Færøerne består nævnet af landfogeden (politimesteren), 2 medlemmer valgt af og blandt politipersonalet i politikredsen, samt 4 medlemmer valgt af lagtinget og blandt dettes medlemmer.«

b. § 1, nr. 37, § 149, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»Hovedsproget i retten er færøsk, men dansk kan ligesavel anvendes som færøsk.«

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta á næstu figgjarlóg peningaliga játtan til Fróðskaparsetur Føroya at gera orðalista við føroyskum ættarorðum og at skipa fyri skeiði til endurútbúgving av fólki á dómara-, fúta- og løgregluskrivstovunum at skriva føroyskt rættarmál.

III Uppskot

til

samtyktar

»Í § 131 indsættes som stk. 3:

»**Stk. 3.** Enhver, der er myndig, har ført retskaffen vandel og ikke er ude af rådighed over sit bo, kan på Færøerne udføre retssager for andre. De i §§ 133, 134 og 136 indeholdte regler finder med de lempelser, der følger af forholdets natur, anvendelse på sådanne personer, der udfører retssager for andre som erhverv.«

Sí skjal 3. og 4.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskot I varð samtykt við 28-0 atkvøðum, uppskot II samtykt við 25-0, og uppskot III varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 501 8 2.

2. Val av álitismonnum og nevndum

Ár 1986, fríggjadagin 1. august legði løgtingsformaðurin fram yvirlit yvir álitismenn og nevndir, ið veljast skulu.

Sí bls. 8

3. Broytingar í borgarligu revsilógini

Ár 1986, friggjadagin 1. august legði rættarnevndin fram soljóðandi

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir til, at tær lógir og fyriskipanir viðvíkjandi broytingum í borgarligu revsilógini, sum landsstýrið legði fyri tingið við løgtingsmáli nr. 76/1985 verða at galda í Føroyum og verða kunngjørdar eftir lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 um »kundgørelse af love og anordninger på Færøerne«.

Viðmerkingar:

Málið varð framlagt hin 26. februar 1986 av landsstýrinum. Við fyrstu viðgerð 6. mars varð málið beint í rættarnevndina. Við aðru viðgerð 13. mars varð samtykt at gera rættarnevndina til miltumtingsnevnd við tí fyri eyga at framleggja málið aftur á ólavsøku.

Fyrr var tað soleiðis, at tá danskar lógir vórðu samtyktar í fólkatinginum og vóru hildnar at hava áhuga fyri Føroyar, so varð fyrispurningur sendur landsstýrinum, um hesar lógir skuldu setast í gildi í Føroyum. Fyri einum 20 árum síðani kom ólag í. Ikki allar lógir vórðu sendar landsstýrinum, og ikki allar av teim innsendu vórðu viðgjørdar í landsstýrinum. Sostatt kann sigast, at talan er um eitt slag av uppruddingararbeiði. Í december 1985 sendi Føroya landfúti landsstýrinum eina frágreiðing viðvíkjandi hesum málsøki. Hetta er drúgvt arbeiði, ið fevnir um:

1) yvirlit yvir revsilógarbroytingar, ið eru settar í verk í Føroyum,
2) yvirlit yvir lógir viðvíkjandi revsilógarbroytingum, ið ikki eru settar í verk í Føroyum,

3) yvirlit yvir lógir, ið hava samband við revsilógina, og sum ikki eru settar i verk í Føroyum,
4) viðmerkingar til spurningin um at seta í verk revsilógarbroytingar í Føroyum viðv. pkt. 2,
5) viðmerkingar til spurningin um at seta í verk fyri Føroyar tær undir 3) nevndu lógir, og
6) galdandi revsilóg í Føroyum.

Meðan rættargangslógin skal viðtakast av fólkatinginum, kann revsilógin avgreiðast við fyriskipan. Neyvt samband er millum lógirnar, og umráðandi er, at tær verða avgreiddar umleið um somu tíð. Rættarnevndin leggur til álit fram viðvíkjandi rættargangslógini og revsilógini samstundis.

Inngangur og almenn sjónarmið í samband við revsilógina eru tey somu sum í samband við rættargangslógina. Grundsjónarmiðið er, at so leingi samskifti okkara er so nær tengt upp í donsk rættarviðurskifti, er týdningarmikið, at viðurskiftini eru javnlík. Umframt at fáa umsitingina liðiliga og meira rationella, er eisini umráðandi, at hin føroyski borgarin í Føroyum ikki er verri fyri, tá talan er um revsilóg enn fólk í Danmark. Leggjast má aftrat, at í mongum førum, eitt nú í revsilógini, hava danskar lógir og praksis ávirkan á føroysk viðurskifti uttan mun til, um lógirnar eru settar í verk í Føroyum ella ei.

Uttan at fara út í kjak viðvíkjandi heimastýrislógini kann tó sigast, at løgtingslógir hava gildi og kunnu vera øðrvísi enn danskar lógir. Ofta hevur verið kjak um, hvørt heimildin er til staðar, tá hugsað verður um heimastýrislógina. Tað lata vit fara á hesum sinni og kunnu bert sláa fast, at løgtingslógir verða virdar, tí tær verða virdar bæði í Føroya rætti, landsrætti og hægstarætti.

Tað sær út til, at viðvíkjandi revsilógini er sama støða sum í rættargangslógini við neyðugari einfaldgering og dagførslu. Landsstýrið tekur undir við álitinum frá landfútanum og mælir løgtinginum til at gera tað sama. Arbeiðsbólkurin, ið hevur gjørt frágreiðingina í hesum máli, hevur gjørt metingar um, hvat ið er realistiskt politiskt møguligt at fáa samtykt í tinginum. Landsstýrið hevur tikið undir við hesum metingum.

Tað er sera trupult at gera eina frágreiðing frá fundinum, tá talan er um torskilt tøkni og løgfrøði. Frágreiðingin frá fútanum er ein úrskurður av einum tilfari upp á nógvar, nógvar hundrað síður. At gera úrskurð úr hesum verður aftur trupult og ikki fyri leikfólk at endurgeva. Vegleiðingin hjá fútanum, ið hevur meira enn 10 ára royndir í Føroyum, er væl undirbygd. Hann vísir m.a. á lógir, ið hann ikki heldur, at orsøk er til at mæla landsstýrinum til at seta í verk í Føroyum, tí við tí kunnleika, hann hevur til samfelag okkara, metir hann, at tað ikki er realistiskt. Í hesum er rættarnevndin samd.

Spurningurin um fyrningarfreist viðvíkjandi brot á skattalóggávuni er gjølliga umrøddur undir punkt 4, 8, s. 18, meðan spurningurin um skattasvik og smugling er viðgjørdur undir punkt 4, stk. 6.

Sum kunnugt arbeiðir landsstýrið við at gera revsireglur í samband við skattasvik. Tilfarið í frágreiðingini frá fútanum er væl egnað at stýðja seg til, tá tað arbeiðið verður gjørt.

Punkt 4, 8: Hetta er lógarbroyting, ið fór fram í 1973 í Danmark viðvíkjandi smærri »Berigelses«- misbrotum.

Hetta snýr seg um, hvat ið gerast skal, tá ein, ið er leyslatin á reynd, fremur nýtt lógarbrot í reyndartíðini. Av tí at henda lóg ikki er sett í verk í Føroyum, førir tað við sær, at fyrispurningurin skal leggjast fyri danska løgmálaráðið í staðin fyri dómaran í Føroyum. Tað er eyðsýnt fyri allar partar, at tað er dómarin, ið skal avgera slík mál.

Eftir hesi broyting verður revsikarmurin fyri grovasta slag av narkotikakriminaliteti hækkaður til tíggju ár. Í løtuni er hetta seks ár. Endamálið er at fáa fatur á vinnuligu virkseminum við vandamiklum evnum.

Lóg nr. 132 frá 9. apríl 1980 um broytingar í revsilógini (sekt fyri bøtur, ið ikki eru dømdar í rættinum).

Talan er um at beina reglurnar um umskapan av bótum, ið eru álagdar uttan fyri rættin. Tá ein bót verður áløgd í rættinum, verður samstundis sagt, hvat umskapanarrevsingin er. Solciðis er ikki, tá ið talan er um bøtur, ið eru álagdar uttan fyri rættin eftir galdandi lóg. Sum er, er henda regla bert galdandi fyri bøtur upp til 1.000 krónur. Tá kann løgreglan seta umskapannarsektina í verk, og merkir hetta ein dag fyri hvørjar 100 krónur. Er bótin yvir 1.000 kr., kann umskapannarsekt bert setast í verk, eftir at málið er skotið inn fyri rættin.

Eftir broytingini førir ein bót upp til 399 kr. tveir dagar at sita og bót upp á 1.000 kr. átta dagar at sita.

Fyri ein ordans skuld skal nevnast, at talan er ikki um at velja at sleppa at sita í slíkum førum. Hetta kemur bert upp á tal, um tann, ið hevur fingið bótina, ikki er førur fyri at gjalda. Eftir tí, ið fútin sigur, so eru ikki nógv, ið sita fyri bót.

Lóg nr. 257 frá 27. mai 1981 (síðu 57). Talan er um broytingar í revsikarminum viðvíkjandi neyðtøku, ífesting við vilja og rán.

Tað er annars eitt í hesi lógarbroyting, ið gevur orsøk til serliga viðmerking.

Tó skal nevnast, at uppi í broytingunum eru eisini slíkar, ið hava samband við millumtjóða reglur.

Tað er ein samd ræsttarnevnd, ið mælir tinginum til at taka undir við uppskotinum.

2. viðgerð 23. september 1986. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.Lj.nr. 501-2-1.

4. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ídnaðargrunn

Ár 1986, leygardagin 30. august legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ídnaðargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 68 frá 24. september 1970 um Føroya Ídnaðargrunn verða hesar broytingar framdar:

1) § 2 verður orðað soleiðis:
   »Landsstýri fyriskipar viðtøkur grunsins.«
2) § 14 verður orðað soleiðis:
   »Í hesum føri tekur landsstýrið støðu til, hvussu skal verða við ognum grunsins.«

§ 2.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om industrifonden.

§ 1.

I lagtingslov nr. 68 af 24. september 1970 om Færøernes industrifond foretages følgende ændringer:

1) § 2 affattes således:
   »Landsstyret bestemmer fondens vedtægter.«
2) § 14 affattes således:
   »I dette tilfælde bestemmer landsstyret, hvordan skal være med fondens værdier.«

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Vísandi til hjáløgdu áheitan frá forsætismálaráðnum og nevndini fyri ídnaðargrunnin hevur landsstýrið avgjørt at leggja fram broytingaruppskot til lógina

um idnaðargrunnin, soleiðis at hesin nútíðar heilt leysur av avgerðarrætti fyrisætt ísmálaráðsins.

Sí skjal 5.

1. viðgerð 16. september. Málið varð beint í idnaðarnevndina, sum 29. januar 1987 legði fram soljóðandi

Álit

Uppskotið var framlagt av landsstýrinum tann 30. august 1986 og eftir 1. viðgerð 17. september 1986 beint í idnaðarnevndina.

Idnaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 4. februar 1987. § 1 varð samtykt við 25-0, § 2 við 27-0 atkvøðum. Við 27-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. februar. Málið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

FLj.nr. 1212 3 1 Lóg nr. 94 frá 19. november 1987.

5. Fíggjarløgtingslóg 1987

Ár 1986, leygardagin 30. august legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Sí skjøl 6A og 6B.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot til fíggjarløgtingslóg, sum í dag verður lagt fyri tingið, er fyri fíggjarárið 1987.

Uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1987 javnvegur við 1.644.805.000,- kr.

Sammett við fíggjarløgtingslógina fyri 1986, sum javnvegaði við 1.563.435.000,- kr. er tað ein vøkstur uppá 5%.

Tað, sum dentur hevur verið lagdur á undir viðgerðini av hesum fíggjarlógaruppskoti er:

at landskassin hevur neyðugar inntøkur og neyðugan likviditet alt árið til at loysa samfelagsuppgávur sínar,
at meta útreiðslurnar til fiskivinnuna so realistiskt sum gjørligt,
at seta neyðugan pening av til avdráttir av lánum,
at seta mest møguligt í grunnar,
at spara mest møguligt í vanliga rakstrinum og
at geva plass fyri einum parti av teim nýggju tiltøkum, ætlanin er at fremja í hesum valskeiði.

Eins og seinasta ár var í apríl mánað skriv sent øllum stovnum landsins, har stovnarnir vóru bidnir um at gera fíggjarætlan fyri 1987 eftir leiðbeining landsstýrisins, sum í høvuðsheitum gekk út uppá, at lønarútreiðslurnar vóru roknaðar eftir lønini galdandi 1. juli 1986 við teim aldursviðbótum, ið gera seg galdandi innan 31. december 1987.

Allar aðrar konti uttan leiguútreiðslur skuldu tilsamans verða settar til somu upphædd í 1987, sum samlaða nýtslan á hesum kunti hevði verið í fíggjarárinum 1986, tó ikki uppum játtanina fyri 1986 + 5%.

Út frá hesum hevur landsstýrið mett um tørvin til nýnormeringar og øktar útreiðslur.

Landsstýrið hevur ikki mett tað neyðugt at leggja upp fyri við dýrtíðarvið bótum.

Hetta er triðja fíggjarlógaruppskotið, ið verður lagt fyri tingið síðan keldu-

skattaskipanina, har skatta- og tollinntøkur verða mettar eftir metingum um virksemi fyri komandi ár.

Í 1985 og í 1986 hava metingarnar um inntøkurnar bildið, og skattainntøkan fyri 1987 er eisini mett varliga.

Heldur ikki í ár er lántøka ætlað í fyriliggjandi uppskoti.

Heldur hevur landsstýrið roynt at leggja mest møguligt í grunnar, ikki bert at standa í móti við, t.d. veðhaldsgrunnin, har aftur í ár er skotið upp at játta 50.000.000,- kr., men eisini til íløgur, so landskassin í størri mun fíggjar íløgurnar yvir fíggjarlógina í staðin fyri við lántøku.

Landsstýrið hevur tí lagt av til íløgur í størri mun enn árini frammanundan, sjálvt um bíðað eigur at vera við at seta ymiskar byggingar í gongd.

Landsstýrið metir, at tað er rætt so líðandi at minka stuðulin til fiskivinnuna, og geva henni høvi til at laga viðurskifti sini eftir veruligari kostnaðarlegu.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1987 er stuðulin til fiskivinnuna eins og tey tvey undanfarnu árini minkaður nakað.

Í løtuni er virksemið í landinum óvanliga stórt.

Landsstýrið leggur dent á at føra ein varligan fíggjarpolitikk og ikki freistast til at leggja almennu útreiðsluleguna eftir einum tílíkum ári sum í ár.

Um fíggjarlógaruppskotið fyri 1987 sum heild kann sigast, at hóast inntøkurnar eru varliga mettar, hevur tað eydnast at halda so mikið aftur í vanliga rakstrinum at pláss hevur verið fyri at leggja størri part av útreiðslusíðuni í grunnar enn árini frammanundan, eins og plass er fingið fyri einum parti av teim nýggju tiltøkum henda samgonga hevur sett sær fyri at fremja.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. december legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 30. august 1986 og undir fyrstu viðgerð tann 1. oktober 1986 beint í fíggjarnevndina.

Í framløguskrivi landsstýrisins varð tilskilað, at dentur hevur verið lagdur á:

1. at meta útreiðslurnar til fiskivinnuna so realistiskt sum gjørligt.
2. at seta neyðugan pening av til avdráttir av lánum,
3. at seta mest møguligt í grunnar,
4. at spara mest møguligt í vanliga rakstrinum,
5. at geva pláss fyri einum parti av teimum nýggju tiltøkum, ætlanin er at fremja í hesum valskeiði.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 1987 kemur at javnviga við kr. 2 milliardum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið, og hevur lagt dent á at fáa lýst fíggjarlógaruppskotið so væl sum gjørligt.

Har tørvur hevur verið á at lýsa ávís viðurskifti, eru upplýsingar útvegaðar, og hava landsstýrismenn, stovnsleiðarar og aðrir verið á fundi at greiða frá og svara spurningum í samband við fíggjarlógaruppskotið.

Harumframt hava fundir verið við peningastovnar, búskaparráðið og Føroya Fiskasølu.

Eins og seinasta ár er niðurstøðan, at orsøkir eru at halda aftur í byggivirkseminum bæði á almenna og privata økinum.

Bráðneyðugt er tí at útvega neyðug stýringsamboð og mælir meirilutin til, at landsbankin verður stovnsettur skjótast gjørligt.

Í mong ár eru ávaringar og áheitanir komnar frá ráðgevandi nevndini eins og øðrum búskaparfrøðingum um at rætta upp føroyska búskapin, sum í alt ov stóran mun hevur havt slagsíðu, tá ið talan er um inn- og útflutning landsins.

Boðað var týðuliga frá, at henda skeiva búskaparliga gongd ikki kundi halda fram, skuldi sleppast undan álvarsligum avleiðingum.

Landsstýrissamgongan setti tí tiltøk í verk, ið miða ímóti at tálma tí ovurstóru nýtslu, sum hevur verið seinastu árini.

Meirilutin ásannar, at tað eru ikki tær lágu inntøkurnar, ið skapa hesa ovurnýtslu, men ásannarí hesum sambandi, at neyðugt verður at broyta skattastigan, soleiðis, at tær lægstu inntøkurnar fáa ein lætta í skattinum, og heitir á landsstýrið at skipa fyri hesum.

Umráðandi er, at meirinntøkan av áðurnevndu tiltøkum fer ikki út í øktari nýtslu, men í mest møguligan mun verður tikin úr peningaumfarinum, og harvið bøtir um búskaparligu støðu landsins.

Upprunaliga javnvegaði fíggjarlógaruppskotið við kr. 1.644.805.000,-, meðan mettu inntøkurnar nú eru settar til kr. 2.004.805.000,-.

Í sambandi við henda inntøkuvøkstur skjýtur meirilutin upp, at peningur í størri mun verður settur í grunnar, so sum endurnýgging av fiski- og farmaskipaflotanum og effektivar veðhaldsbindingar. Somuleiðis er upphæddin til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna økt um munandi.

Harumframt eru smávegis broytingar gjørdar á útreiðslusíðuni, og standa hesar í samband við nøkur av teimum tiltøkum, sum samgongan ætlar at fremja.

Eftir galdandi skipan verður yvirskot landskassans býtt á ein ávísan hátt.

Fleiri uppskot hava verið um eina umskipan her, og eigur landsstýrið at taka hendan spurning til viðgerðar í samband við meirinntøkurnar, ið standast av seinastu inntøkulógunum, og í samsvar við framman fyri standandi viðmerkingar.

Viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum ásannar meirilutin, at bráðneyðugt er við ávísum ábótum — her íroknað nýnormeringar.

Ráðleggingarnevndin fyri sjúkrahúsverkið hevur fyri stuttum givið tíl kenn

ar, hvussu hesin spurningur frægast kann loysast.

Meirilutin skjýtur tí upp, at ortopædikirurgur verður settur á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum, og at skurðstova verður bygd á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Viðvíkjandi almennum starvssetingum hevur meirilutin tikið tá støðu, at umlegging av støvum á verandi stovnum verða at leggja fyri fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin býtt seg í ein meirihluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir fram hesi

Broytingaruppskot

§ 1 **Skattur**

1201 Vanligur landsskattur

Verður settur til	kr.	975.000.000
Greinin verður sett til	kr.	1.015.000.000

§ 2 **Toll- og framleiðslugjald**

2017 Tollgjøld verður sett til	kr.	1.050.000.000
2805 Brennioljugjald / brændselsafgift kr. 100.000.000		
2207 Lagt í oljugrunn / henlagt i oliefond	kr.	0
kr. 100.000.000. Greinin verður sett til	kr.	972.000.000

§ 6 **Landsstovnar**

6204 Telefonverkið verður sett til	kr.	39.000.000
6306 Útvarpið verður sett til	kr.	0
6311 Sjónvarpið verður sett til	kr.	0
Greinin verður sett til	kr.	31.590.000

§ 11 **Landsfyrisitingin**

11359 Almannastovan verður sett til	kr.	11.931.000
Hækkingin uppá kr. 700.000 er til ný normering av 1 stjóra og 2 deildarstjórum. Álagt verður Almannastovuni at lata sosialráðgevaran fyri Vágar og Norðstreymoy arbeiða í økinum.		
11471 Gjaldstovudeild í Saltangará verður sett til	kr.	758.000
Hækkingin uppá kr. 88.000 er til starvsfólkalønir.		
Greinin verður mett til	kr.	121.516.000

§ 12 **Heilsumál**

12109 Landssjúkrahúsið verður sett til ..... kr. 81.125.000
Játtanin er hækkað við kr. 200.000
til laboranttænastu uttan fyri Havnina.

Nýggj konto

12310 Játtan til sjúkrahúsverkið ..... kr. 6.000.000
Bevilling til sygehusvæsenet.
Ortopædkirurgur verður settur
á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum
og skurðstova bygd á Klaksvíkar
sjúkrahúsi. Greinin verður sett til ..... kr. 125.056.000

§ 13 **Samferðslumál**

I. **Nýggir vegir og brýr v.m.**
Viðvíkjandi vegastrekkinum Miðvág-
Vatnsoyrar verður fylgjandi at skoyta
uppí viðmerkingarnar í fylgiskjølunum
síðu 92 (§ 136) aftaná orðini »byrging og
tunnil«: »brúgv um Sjatlá«.

§ 14 **Skúlamál**

14205 Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum
verður sett til ..... kr. 18.372.000
Hækkingin uppá kr. 500.000 er til
útskifting av hitaketlum og
vindeygum.
14694 Landmátaraskeiðið gongur út. Skeiðið má
fíggjast av vanligu játtanini til skeið-
virksemi.
14901/313128 Studningur til Í.S.F. (viðm.)
Í viðmerkingini til hesa játtan verður
»kr. 75.000« broytt til: »kr. 300.000«.
14953/313302 Ítróttar- og skúlabyggigrunn.
Til hesa játtan verður sett fylgjandi
viðmerking:

»til § 14/14953/313302.
Studningur til graslíkisvallir verður at veita saman við fíggjarnevndini.«

»til § 14/14953 313302
Tilskud til kunstgræsplæner bevilges sammen med finansudvalget.«

14953/313343 Aðrir studenta- og HF-skúlar
verður sett til kr. 2.000.000.
14953/313455 Ungmannafeløgini LFU, UF og FUR.
Kontoin verður verður nevnd: »Ungmannafeløgini og skótarørslan.
Ungdomsforeningerner og spejderbevægelsen«, og játtanin hækkað við
kr. 248.000 til kr. 600.000.
Greinin verður sett til ..... kr. 172.113.000

§ 15 **Vísindi, bókmentir og list**

15406 Føroya Fornminnissavn verður sett til ..... kr. 5.000.000
15755 Fróðskaparsetur Føroya verður sett til ..... kr. 9.537.000
15907/323149 Fornminnissavn í
grunn verður sett til ..... kr. 2.000.000
15907/323108 Lán og studningur til
bókaútgávu verður hækkað við
kr. 200.000 og sett til ..... kr. 300.000
15907/323228 Mentunargrunnurin (MFL)
verður hækkað við kr. 350.000
og sett til ..... kr. 1.300.000
15907/323244 Savn í Hoyvík, í grunn,
verður sett til ..... kr. 0
15907/323372 Sjónvarp, í grunn, verður sett til ..... kr. 7.000.000
Byggiheimildin frá 1982 verður at broyta
soleiðis, at heimildin er hjá landsstýri
num saman við fíggjarnevndini.
15907/323397 Kirkjubøstólarnir, í grunn,
gongur út. Henda konto og konto 323244
Savn í Hoyvík eru samanlagdar við
konto 323149 Fornminnissavn í grunn.
Greinin verður sett til ..... kr. 84.959.000

§ 16 **Fiskivinna, sigling o.t.**

16904/333017 Minstaløn og annar stuðul
verður sett til ..... kr. 245.000.000
16904/333025 Studningur til grunnin til
endurnýggjan av fiski- og farmaskipaflotanum,
verður sett til ..... kr. 100.000.000
Greinin verður sett til ..... kr. 375.709.000

§ 18 **Handil, íðnaður o.t.**

18202 Bileftirlitið.
Av játtanini í grunn konto 353075
verða 1,5 mió. kr. at avseta til hølir,
so byggjast kunnu hóskandi hølir úti
um landið.

18356 Ferðamannamiðstøðin.
Játtanin til framtaksútreiðslur verður
at býta millum verandi ferðamannastovur.

§ 19 **Almannamál v.m.**

19904/363532 Andveikravarðin, bygging
í Runavík, í grunn, verður sett til ..... kr. 4.000.000
og orðini »bygging í Runavík« ganga út.

Sett verður sum nýggj konto:
»19904/363840 Menningarhjálp, í grunn.
Udviklingshjælp, i fond ..... kr. 5.000.000
Játtanir úr grunninum til menningar-
hjálp skulu leggjast fyri fíggjarnevndina
til góðkenningar.
Greinin verður sett til ..... kr. 294.917.000

§ 21 **Effektivar veðhaldsbindingar**

21019 Effektivar veðhaldsbindingar
verður sett til ..... kr. 80.000.000

§ 22 **Aðrar óvissar útreiðslur**

253808 Studningur til politiska upplýsing
verður sett til ..... kr. 2.000.000
Greinin verður sett til ..... kr. 3.735.000

§ 23 **At leggja í ymsar grunnar v.m.**

383058 Avlopið hjá Telefonverkinum,
verður sett til ..... kr. 39.000.000
383102 Avlopið hjá Útvarpinum,
verður sett til ..... kr. 0
Avlopið hjá Sjónvarpinum,
verður sett til ..... kr. 0
Greinin verður sett til ..... kr. 40.220.000

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) førir fram:

Landsstýrið legði uppskot sítt til figgjarlóg fyri 1987 fram tann 30. august 1986.

Uppskotið javnvegaði við kr. 1.644.805.000.

Sammett við figgjarlógina fyri 1986, sum javnvegaði við kr. 1.563.435.000, merkti hetta ein vøkstur í krónum uppá 81.370.000, ella eina hækking uppá 5%.

Fyrsta viðgerð av figgjarlógaruppskotinum fyri 1987 var heilt óvanlig. Tingformaðurin bað tingmenn gera skjótt av, og heldur hava eina 1. viðgerð í sambandi við 2. viðgerð av hesum løgtingsmáli.

Hetta hevur ført við sær, at figgjarnevndin undir viðgerðini av málinum hevur havt ov vánaliga hylling av, hvat tingmenn halda um uppskot landsstýrisins.

Figgjarmálaráðharrin vísir í viðmerkingunum í 6 punktum, hvat landsstýrið hevur lagt mesta dentin á undir tilevningini av uppskotinum.

Í grundini verður einki nýtt borið fram. Í 6. petti verður sagt, at plássa er í figgjarlógaruppskotinum fyri einum parti av teimum ætlanum, sum skulu fremjast í hesum valskeiði. Tó verður ikki her sagt frá, hvørji ítøkilig tiltøk talan er um.

Undir viðgerðini hevur tað víst seg, at tað inntøkugrundarlagið undir inntøkunum til landskassan, sum landsstýrið hevur bygt á, er heilt burturvið. Tað vísir seg, at inntøkur landskassans eftir galdandi inntøkulógum í 1987 verða hundraðtals milliónir størri enn landsstýrið hevði roknað við. Hetta er nærri lýst niðanfyri.

Hetta er ein váttan av tí, sum sambandsflokkurin hevur ført fram um figgjarviðurskiftir landskassans, bæði í heila tikið síðan hetta landsstýrið tók við, og eisini og serliga í sambandi við viðgerðina av teimum inntøkulógum, sum samgongan fyri stuttum samtykti á løgtingi, inntøkulógir sum vísa seg at kosta hvørjum einstøkum borgara millum 3.000 og 6.000 kr.

Tað er nú endaliga prógvað, at samgongumenn søgdu ósatt fyri fólkinum, tá teir tvíhildu um, at landskassanum tørvaði tær umleið 200 mió. kr., sum inntøkulógirnar árliga eru roknaðar at geva.

Samstundis er prógvað, at sambandsflokkurin hevur rætt í, at hóast tað er neyðugt at avmarka privatu nýtsluna í Føroyum, so er eingin ørsøk til at beina pening inn í landskassan. Tvørturímóti førir hetta við sær øktan almennan aktivitet, sum jú longu er alt ov stórur. Og øktur almennur aktivitetur økir upp aftur meira um privatu nýtsluna.

Tað var út frá hesum sannroyndum, at Sambandsflokkurin skjeyt upp at avtaka tollhækkingarnar, og ístaðin seta í verk bundna uppsparing, ein loysn sum førdi við sær eina munandi avmarking í privatu nýtsluni, og sum samstundis førdi við sær, at tann einstaki borgarin í Føroyum eftir stuttari tíð átti sin part av einum innistandandi tilgóðahavandi uttanlands uppá umleið eina milliard krónur. Tað er óneyðugt at siga frá, hvønn týdning hetta hevði havt fyri føroysku nettouttanlandsskuldina.

Tað er nú eisini heilt greitt, at skammiliga og skaðiliga umrøðan av Føroyum í altjóða fjølmiðlum fyri hálvumøðrum ári síðan, har tosað varð um bananrepublikkir v.m., var fullkomiliga ógrundað.

Tann ovurstóri vøkstur í inntøkum landskassans stavar fyrst og fremst frá úrslitunum av teimum produktivu íløgunum, sum undanfarna samgonga skipaði fyri. Tær produktivu íløgurnar, sum nýggja landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja, hava av góðum grundum enn ikki givið inntøkur til landskassan, tvørturímóti. Men vónandi koma tær at gera tað seinni.

Tað hevði tó verið skeivt at sagt, at sitandi samgonga ikki hevur nakran heiður fyri vøkstrinum í skatta- og tollinntøkum landskassans. Tann veruleikin, at sitandi landsstýrið fullkomiliga hevur mist tamarhaldið, tá talan er um aktivitetin innan óproduktivar íløgur og útreiðslur í okkara samfelagi, hevur sjálvandi ført við sær øktar lønarinntøkur v.m., sum eisini ávirka inntøkur landskassans. Hinvegin er hesin vøkstur ikki samanlagt nakar fyrimunur fyri føroyska búskapin.

Sum tað framgongur av áliti meirilutans, er talan um eitt yvirskot á broytta fíggjarlógaruppskotinum fyri 1987 uppá umleið 250 mió. kr., tá konto fyri toll og framleiðslugjøld er sett 100 mió. kr. lægri enn gjaldstovan metir. Hetta svarar til eitt yvirskot uppá umleið 400 mió. kr., verða broytingaruppskotini frá minnilutanum samtykt.

Hetta átti at gjørt tað greitt fyri løgtinginum, at uppskot sambandsfloksins um avtøku av tollhækkingum landsstýrisins eiga at verða samtykt sum skjótast. Hetta hevði ført við sær, at yvirskotið á fíggjarlógaruppskotinum fall til umleið 200 mió. kr.

Hetta yvirskot uppá umleið 200 mió. kr. eigur, saman við peninginum frá bundnu uppsparing borgaranna, fyribils at verða bundið uttan fyri Føroyar. Við hesum tryggja vit í enn størri mun, at almenni og óproduktivi aktiviteturin ikki veksur enn meira, og vit tryggja eisini, at nettouttanlandsskuldin ikki veksur í tann mun, talan annars verður um.

Í framløguskrivinum frá fíggjarmálaráðharranum verður sagt, at skrivað hevur verið út til stovnarnar, har teimum verður álagt, at allar konti, uttan leiguútreiðslur, skuldu verða settar til somu upphæddir fyri 1987, sum nýtslan hevur verið í 1986. Tó mátti ikki farast upp um játtanina fyri 1986 + 5%.

Út frá hesum hevur landsstýrið mett um tørvin til nýnormeringar og øktar útreiðslur annars.

Aftaná at nevndin hevur gjøgnumgingið uppskot landsstýrisins, má ásannast, at hesin setningur fíggjarmálaráðharrans í flestu førum ikki er fylgdur. Útreiðslurnar hjá flestu stovnum eru øktar munandi meira enn ætlað av landsstýrinum.

Sum áður nevnt hevur landsstýrið heilt og fullkomiliga mistikið seg, tá talan er um at meta um inntøkur landskassans fyri 1987. Seinasta dagin, uppskotið var til viðgerðar í nevndini, komu umboðini fyri landsstýrissamgongunа til ta niðurstøðu, at fíggjarlógaruppskotið eigur at javnviga við kr. 2.104.805.000. Talan er um eina hækking uppá kr. 541.370.000 í mun til fíggjarlógina 1986. Í procentum svarar hetta til eina hækking uppá 34,6%. Við øðrum orðum metti landsstýrið ov lítið við 30%, og má hetta haldast vera met í so máta.

Vit sakna eina frágreiðing frá landsstýri og samgongu um ætlanina við hesi veldigu meirinntøku til landskassan, ein meirinntøka sum fyri ein part stavar frá seigpíning av føroyska fólkinum í formi av óneyðugum eykabyrðum.

Sparsemi leitar ein til fánýtis eftir í hesum lógaruppskoti. Vit finna ikki eina ta einastu ábending um, at hetta landsstýrið hevur í hyggju at spara ella tálma tær almennu útreiðslurnar. Tvørturímóti økist almenna umsitingin alsamt. Bert í hesum fíggjarlógaruppskoti hevur landsstýrið givið loyvi til út við 100 nýnormeringar innan almennu umsitingina. Væntast kann, at talið í veruleikanum verður enn størri.

Sammeta vit hetta fíggjarlógaruppskotið við seinastu fíggjarlógina, sum undanfarna samgonga hevði ábyrgdina av, fyri 1984/85, so er hend ein veldig hækking uppá kr. 796.510.000, í procentum er vøksturin 61%.

Tað kann ikki undra nakran, at hetta landsstýrið hevur verið úti fyri so nógvum mótmælum frá fólkinum sum einki landsstýri fyrr. Konfliktir millum landsstýrið annan vegin og flestu fakfelagini í landinum og ymiskar stovnar v.m. hin vegin hevur verið nærum dagligur kostur, síðan hetta landsstýrið tók við.

Sambandsflokkurin hevur altíð hildið tað vera umráðandi, at landsins fíggjarmegi verður væl umsítin, og at gjølla verður ansað eftir, at landsins fíggjarviðurskifti ikki koma í ólag.

Vegna flokkin ásannar minnilutin eina ferð enn, at inntøkulógirnar, sum samgongan samtykti í heyst, og sum nú gera vart við seg millum manna, eru óhepnar fyri okkara búskap. Samstundis verður at enda aftur mint á mótuppskot sambandsfloksins, sum hin vegin koma at gagna samfelagnum, gagna føroyska búskapinum, og sum fara at verða borgaranum og harvið tí føroyska samfelagnum til stóran fyrimun.

Minnilutin setir fram hetta broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins.

§ 1. **Skattir og**

§ 2. **Toll- og framleiðslugjøld**

Út frá teimum upplýsingum, ið fíggjarnevndin hevur frá gjaldstovuni og líkningarráðnum verður konto fyri skattir sett til kr. 1.015.000.000 og konto fyri toll og framleiðslugjøld sett til kr. 1.072.000.000.

§ 6. **Landsstovnar**

Tikið verður undir við broytingunum hjá meirilutanum.

Greinin verður sett til kr. 31.590.000.

§ 11. **Landsfyrisitingin**

Stovnseting av landsbanka v.m, verður strikað.

Greinin verður sett til kr. 116.678.000.

§ 12. **Heilsumál**

Konto 12109. Tikið verður undir við uppskoti meirilutans um laborant-tænastu uttan fyri Havnina.

Kontoin verður sett til kr. 200.000.

Nýggj konto, Yvirlækni í ortopædi, verður sett til kr. 400.000. Skrivari til sama yvirlækna, sett til kr. 120.000.

Sambandsflokkurin gongur heilt og fult inn fyri at varðveita og at fremja eina rímuliga úthygging av tænastustøðnum á teimum smærru sjúkrahúsunum, men tað verður hildið bráðneyðugt, at settur verður skurðlækni í ortopædi á landssjúkrahúsinum.

Greinin verður sett til kr. 120.111.000.

§ 13. **Samferðslumál**

Viðmerking. Ískjótt trý ár hevur eingin havnaætlan verið fyri størri havnir. Fleiri av teimum størru havnunum eru bert partvíst útbygdar, meðan skipini gerast størri og størri, og krøvini til havnaløgini alsamt vaksa.

Út frá hesum setir minnilutin fram hetta

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera eina fimmáraætlan fyri størri havnir og leggja hesa fyri løgtingið í hesi tingsetuni.

Tikið verður undir við, at útreiðslurnar til brúnna um Sjatlá verða goldnar av konto 13.6, Berghols- og brúgvagerð í grunn.

§ 14. **Skúlamál**

Konto 14155. HF skeið í Suðuroy verður sett til kr. 2.924.500.

Viðmerking. Sambært fylgiskjølini er hetta ein rætting.

Konto 14205. Studentaskúlin í Hoydølum. Tikið verður undir við meirilutanum. Kontoin verður hækkað við kr. 500.000 og sett til kr. 18.372.000.

Nýggj konto, Skúlabøkur til næmingar á studentaskúlum og HF-skeiðum, verður sett til kr. 400.000.

Nýggj konto. Studentaskúli í Eysturoy í grunn, verður sett til kr. 1.000.000.

Greinin verður sett til kr. 173.098.000.

§ 15. **Vísindi, bókmentir og list**

Konto 15907/323149, Fornminnissavn í grunn, verður sett til 2.000.000.

Konto 15907/323331, Útvarp Føroya, tilskot til avdrátt av lánum, verður strikað.

Viðmerking: Hildið verður, at útvarpið eigur at arbeiða sum sjálvfíggjandi stovnur.

Konto 15907/323372, Sjónvarp í grunn, verður strikað.

Konto 15907/323364, Sjónvarp Føroya, verður strikað.

Viðmerking. Hildið verður, at sjónvarpið eigur at arbeiða sum sjálvfíggjandi stovnur. Sjónvarpið fær jú, umframt hyggjaragjald, eisini inntøku av hvørjum seldum sjónvarpi og parabolantennu v.m.

Konto 15907/323348, Skjalasavn í grunn, verður lækkað við 1. mió. kr. og sett til kr. 1.000.000.

Greinin verður sett til kr. 73.418.000.

§ 16. **Fiskivinnu, sigling v.m.**

Konto 16904/333017, Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna, verður hækkað við 40 mió. kr. og sett til kr. 265.000.000.

Viðmerking. Minnilutin hevur undir viðgerðini biðið um at fingið, men hevur ikki kunnað fingið, eitt yvirlit yvir fíggjarstøðuna hjá fiskivinnuni. Menn, sum hava innlit í hesi viðurskifti, meta støðuna vera hættisliga. Teir, sum hava beinleiðis við studningsbýtið at gera, mæla til at hækka játtanina til í minsta lagi sama støðið sum í 1986.

Konto 16904/333025, Studningur til grunnin til endurnýgging av fiski- og farmaskipaflotanum, verður hækkað við 35 mió. kr. og sett til kr. 80.000.000.

Konto 16904/333074, Praktiskar fiskiroyndir í grunn, verður hækkað við 5 mió. kr. og sett til kr. 10.000.000.

Viðmerking. Tað verður mett neyðugt at skipa fyri fleiri praktiskum fiskiroyndum, tá tað støðugt verða sett alt størri krøv til okkara fiskiflota úti á djúpum og óroyndum havleiðum.

Nýggj konto, Sjóseting av laksayngli, verður sett til kr. 5.000.000.

Viðmerking. Tað verður mett rætt, at føroyingar av álvara fara undir at sjóseta laksayngul, summpart fyri at gera neyðugar royndir og summpart fyri at standa sterkari í samráðingunum við onnur lond um laksaveiðu.

Greinin verður sett til kr. 385.709.000.

§ 18. **Handil, idnaður o.t.**

Konto 18361, Menningarstova, verður strikað.

Viðmerking. Ídnaðurin eigur sjálvur at reka og fíggja hetta virksemi. Fyrstu árini kann ein minni studningur verða veittur av grunninum fyri ídnaðarfremjandi endamal.

Greinin verður sett til kr. 35.874.000.

§ 19. **Almannamál v.m.**

Konto 19904/383519, Longd barnsburðarhvíld, verður strikað.

Viðmerking. Kontoin hevur onga lógarheimild og ongar upplýsingar um hesi viðurskifti verða givnar í fylgiskjølunum.

Konto 19904/363524, Familjupolitisk tiltøk, verður strikað.

Viðmerking. Eingin lógarheimild er til og einki er viðmerkt í fylgiskjølunum, um hvat peningurin skal nýtast til. Royndir landsstýrisins higartil mótvegis føroyskum familjum hava annars verið sera vánaligar.

Nýggj konto, Menningarhjálp í grunn, verður sett til kr. 6.000.000.

Viðmerking. Peningur verður at játta av landsstýrinum, saman við fíggjarnevndini, til *menningarprojekt* við føroyskari luttøku.

Greinin verður sett til kr. 278.917.000.

Minnilutin Anfinn Kallsberg førir fram:

Fyri nœrum tveimum árum síðan fingu vit nýtt landsstýri.

Sum altíð, tá nýggir kveistrar koma til, verða sett nýggj mál og ofta verða hesi mál sett ivaleysa høgt. Alt gott um tað. Vit minnast, at í staðin fyri at seta sær mál sum landsstýri, nevndu teir seg eina »katastrofunevnd«, sum eftir 500 døgum skuldi fáa hilbukt við uttanlandsskuldina og gjaldsjavnahallinum.

Hesir 500 dagarnir eru nú farnir, og úrslitið fyriliggur. Vit fáa nú at vita, at gjaldsjavnahallið fyri 1986 helst verður um 450-500 mió. kr. ímóti 430 mió. kr. í 1985.

Handilsjavnahallið 1986 verður uppá ca. 890 mió. kr. (skip íroknað) ímoti 688

mió. kr. (skip íroknað) í 1985. Her er sostatt talan um hægri tøl, skeivan vegin, enn undanfarnu ár. Harafturat skal havast í huga, at prísfallið á olju átti at havt betrað úrslitið munandi.

Uttanlandslántøkan er ikki økt í sama mun sum íløgurnar í 1986. Hetta kemur fyri stóran part av tí sterku støðu D. kr. hevur í mun til onnur gjaldoyru sum t.d. U.S.$ og N.kr. Her hava vit havt stóran kursvinning í 1986.

Eisini hevur størsti parturin av vinnulívinum klárað sínar skyldur mótvegis uttanlands lángevarum. Men heldur samgongan fram við at áleggja vinnulívinum hægri toll og skatt, er vandi fyri, at enn fleiri landskassaveðhald gerast effektiv, tá vinnan verður kroyst á slíkan hátt.

Samgongan hevur í heyst framt nýggjar inntøkulógir, sum tilsamans geva landskassanum 190 mió. kr. Av hesum verða tær 90 mió. kr. tiknar frá løntakarum og 100 mió. kr. frá vinnuni. Grundgevingin hjá samgonguni var at tálma nýtsluni.

Eftir teimum upplýsingum, sum fíggjarnevndin hevur fingið, verða meirinntøkurnar í 1986 í mun til fíggjarlógina:

fyri skatt	117 mió. kr.
fyri toll	213 mió. kr.
tilsamans	330 mió. kr. ca.

Hesin peningur verður sambært lóg býttur soleiðis:

1/3 .. 110 mió. kr. í Berghols- og brúgvagrunn.
1/3 = 110 mió. kr. í Grunn til endurnýggjing av skipaflotanum.
1/3 = 110 mió. kr. í landskassans likviditet (Kapitalkonto).

Tá 2 av hesum grunnum fara beinleiðis út í nýtslu, hevur Fólkaflokkurin lagt fram uppskot um at avtaka lógina, fyri at forða fyri at tann almenna nýtslan veksur so ógvusliga og tilvildarliga.

Fyri fíggjarárið 1987 er eisini stórur inntøkuvøkstur í mun til uppskot landsstýrisins. Viðvíkjandi skattinum kann roknast við, at hann helst verður 5% hægri enn í 1986 ella 995 mió. kr. Tá er hædd tikin fyri, at ávís dupultskatting av frítíðarløn er farin fram í 1986 og broytingar í skattaskalanum hjá partafeløgum. Her er sostatt ein hækking uppá 120 mió. kr. í mun til uppskot landsstýrisins.

Viðvíkjandi tollinum kann metast ein hækking uppá 5% í mun til 1986

ella	935 mió. kr.
Harafturat koma nýggju inntøkulógirnar	190 mió. kr.
	1.125 mió. kr.

Her er sostatt ein hækking uppá 413 mió. kr. Inntøkuvøksturin samanlagt verður sostatt umf. 533 mió. kr.

Tað er vónleyst at skilja, við hvørjum grundgevingum, samgongan kann loyva

sær at krevja so nógvan pening frá løntakarunum og vinnulívinum, uttan við einari einastu ábending um, hvat hesin peningur skal nýtast til. Vit eru í tí støðu, at tá landskassin hevur fingið pening til allar sínar samfelagsuppgávur, sambært upprunauppskot landsstýrisins, er eitt avlop uppá umf. 500 mió. kr.

Fólkaflokkurin kundi ikki taka undir við uppskoti samgongunnar, um at senda hesa eykarokning út, og siggja vit í dag, at fólkaflokkurin hevði rætt. Annað er so, at vit øll hava ov stóra nýtslu, men uppskot fólkafloksins um sjálvbodna uppsparing hevði havt dupulta ávirkan, vit høvdu bundið peningin hjá fólki í peningastovnum, og vit høvdu minkað um skattainntøkurnar hjá landskassanum og harvið minkað um møguleikarnar fyri almennari yvirnýtslu.

Um peningurin skuldi nýtast til hall á fíggjarlógini, so var kanska ein meining í at útvega inntøkur til landskassan, men so er ikki.

Uttanlands lántøkur til at fáa fíggjarlógina at javnviga, hevur ikki verið framd síðan 1982, og síðani hevur landskassin goldið sínar skyldur mótvegis uttanlandslántakarunum, soleiðis at netto uttanlandsskuld landskassans í dag er nakað niðanfyri 400 mió. kr. Eisini í fyriliggjandi uppskoti er hædd tikin fyri rentum og avdráttum av hesum lánum.

Í framløguskrivi landsstýrisins verður millum annað sagt: »Dentur hevur verið lagdur á undir viðgerðini av hesum fíggjarlógaruppskoti at spara mest møguligt í vanliga rakstrinum«.

Hetta er í sær sjálvum ein góður málsetningur, men hann fellur fullkomiliga burtur, tá ið landsstýrið í staðin nýtir yvirskotsanpartarnar á fíggjarlógini til nýtslu, t.d. á samferðsluøkinum. Harvið eru útreiðslurnar á fíggjarlógini umleið 13% hækkaðar í mun til 5% sum ætlað.

Hetta er kanouflaga vit lít.

Neyvan hava vit havt eitt fíggjarlógaruppskot við so nógvum nýnormeringum. Samhært yvirlit, ið Grannskoðaradeildin hevur gjørt til fíggjarnevndina, eru hesar 98,7. Herafturat koma nýggjar deildir hjá Líkningarráðnum, Landsbankanum, Skúlamál, Almannamál og aðrir stovnar undir landinum.

Samanlagt man talið fara at nærkast 150.

Vit fara eisini at loyva okkum at ivast um tølini á fíggjarlógini eru veruleikakend.

Td. hava vit Strandfaraskip Landsins.

Stovnurin sigur í síni fíggjarætlan, at útreiðslurnar verða 100 mió. kr. Landsstýrið setir hesa til 87 mió. kr. Harnæst minnir Strandfaraskip Landsins á umsókn um eykajáttan upp á 6 mió. kr. til »stabilisatorar« til Teistan. Umsóknin er játtað av landsstýrinum sum eykajáttan til fíggjarárið 1987.

Málið er ikki avgreitt í fíggjarnevndini og sostatt heldur ikki við á fíggjarlógini.

Tað vil siga, at munurin á tí, Strandferðslan metir sum sínar útreiðslur, og tað, ið stendur á fíggjarlógini, eru 20 mió. kr.

Á § 16 Fiskivinna eru avsettar 225 mió. kr. ella 40 mió. kr. minni enn 1986.

Í figgjarnevndini hava vit fingið upplýst, at við hesi játtan verður studningurin lækkaður við 10% í mun til studningarnar áðrenn 1. oktober 1986 við óbroyttari veiðusamanseting.

Ráfiskagrunnurin hevur brúkt um 25 mió. kr. av tiltaksgrunninum fyri at halda verandi prísir.

Tá nú játtanin lækkar, verður neyðugt eisini at lækka prísirnar munandi í 1987, um veiðan verður óbroytt. Tað varð eisini ført fram, at svartkjaftavinnan ongan studning skal hava eftir 1. januar 1987, hvørki framleiðsla á sjógvi, ei heldur á landi.

Afturat hesum kemur, at fiskivinnunevndin í løtuni hevur til viðgerðar reguleringar viðvíkjandi hjáveiðu av toski, hýsu og upsa. Um stýrt verður soleiðis, at minni kemur upp á land av toski, hýsu og upsa, sum fáa lítlan og ongan studning, fyri at økja um veiðu eftir djúpvatnsfiski sum kongafisk, blálongu o.t., kemur hetta at seta nógv størri krøv til studningsveitingar úr stuðuls- og ráfiskagrunninum.

Síðani kemur, at oljuprísurin í 1986 fall nógv, og harvið uppvegaði ein part av fallinum í fiskaprísinum. Um oljuprísurin aftur hækkar, verður eisini neyðugt við hægri prísum, um fiskivinnan skal halda fram.

Tað er tí altíð ringt at meta um stuðulstørv, tað eru so nógv ting, sum ávirka, men ið hvussu so er, hava samgongumenn í figgjarnevndini verið positivir at taka hesa játtanir upp til nýggja viðgerð í komandi ári, um tað gerst neyðugt.

Undir § 16 Fiskivinna hava vit eisini »Studningur til grunnin til endurnýggjan av fiski- og farmaskipaflotanum.«

Tá hesin grunnur varð stovnsettur, var einans talan um studning, sum var latin skipunum yvir eitt áramál. Síðani eru stórar broytingar farnar fram, soleiðis at í dag umfatar hann triggjar høvuðsuppgávur.

1. Grunnurin letur
   - stuðulslán
   - kurslán
   - likviditetslán

   Hesi lán skulu gjaldast aftur við rentu.
2. Studningur til skipasmiðjur.

   Hetta er beinleiðis studningur latin í samband við skipabygging í Føroyum.
3. Rentustudning sbrt. løgtingslóg frá 1986.

Minnilutin heldur tað verða rættari at greina hesa játtan sundur, tí ein partur kemur innaftur í grunn og setir tí fram.

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í samband við komandi fíggjarlóg at býta »grum til endurnýggjan av skipaflotanum« sundur í ein part fyri lán og ein part fyri studning.

Fólkaflokkurin hevur í løtuni eitt uppskot til viðgerðar á løgtingi um menningarhjálp, og tekur minnilutin tí samsvarandi hesum uppskoti undir við uppskoti meirilutans at avseta 5.000.000 til hetta endamál.

Eftir stendur so, at um nakað skil er á fíggjarstýringini her á landi, kemur landskassin at hava nógvan pening í komandi ári. Sum fólkaflokkurin áður hevur ført fram, er eins neyðugt við almennari uppsparing sum við privatari. Minnilutin hevði tí heldur sagt, at tær 190 mió. kr. vóru uppspardar av privatum. Mén tá vit við lóg nú hava fingið hendan pening í landskassan, er ábyrgd okkara at umsita hann við skynsemi.

Tað skynsamasta undir núverandi umstøðum er, at nakað vael at landskassans meirinntøku verður sett í útlendskar peningastovnar, og helst í teim londum, har vit hava upptikið útlendsk lán.

Minnilutin setir tí fram hetta

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum javnan í fíggjarárinum 1987 at binda í útlendskum peningastovnum (gjøgnum føroysku peningastovnarnar) tann partin av landskassans inntøkum, sum ikki mótsvarast av játtaðum útreiðslum.

Hetta førir við sær eina ávísa kurstrygging av lánum okkara og økir um kredittvirðið.

Nýliga hava samráðingar verið við donsku sjórnina um nýggja refusiónsskipan millum Danmark og Føroyar. Eftir minnilutans meðan átti nýggja skipanin at sæst aftur í fíggjarlógini fyri 1987, men tað hava hvørki landsstýrið ella meirilutin í fíggjarnevndini hildið. Minnilutin kennir ikki skipanina, men tekur fyrivarni fyri møguligum seinri broytingaruppskotum hesum viðvíkjandi.

At enda skal nevnast, at framvegis vantar ein heildarætlan fyri komandi havnabyggingum. Fólkaflokkurin ynskir hesa ætlan framda og fer at taka spurningin upp í samferðslunevndini og tekur sær rætt til har at koma við uppskoti um at avseta ávísa upphædd til hetta endamál, sjálvt um hetta ikki verður fyrrenn aftaná 1. januar 1987.

Álit

Fíggjarløgtingslóg fyri árið 1987
Finanslagtingslov for året 1987

Yvirlit yvir rakstrarætlan fyri fíggjarárið 1987
Oversigt over driftsbudgettet for finansåret 1987

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 1.	Skattir Skatter	1.015.000.000	
§ 2.	Toll- og framleiðslugjøld Told- og fremstillingsafgifter	972.000.000	
§ 3.	Onnur gjøld Andre afgifter	1.700.000	
§ 4.	Inntøkur av spæli Indtægter ved spil	1.100.000	
§ 5.	Rentur og vinningsbýti v.m. Renter og udbytte v.m.		35.545.000
§ 6.	Landsstovnar Landsvirksomheder		31.590.000
§ 7.	Partur av avlopi danska tjóðarbankans Andel i den danske Nationalbanks overskud	15.000.000	
§ 8.	Ymsar inntøkur Diverse indtægter	5.000	
			67.135.000
Nettoinntøka / Nettoindtægt			1.937.670.000
		2.004.805.000	2.004.805.000

	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 10. Løgtingið Lagtinget	11.678.000
§ 11. Landsumsitingin Landsadministrationen	121.516.000
§ 12. Heilsumál Sundhedsvæsenet	125.056.000
§ 13. Samferðslumál Kommunikationsvæsen	219.600.000
§ 14. Skúlamál Undervisningsvæsen	173.113.000
§ 15. Vísindi, bókmentir og list Videnskab, litteratur og kunst	84.959.000
§ 16. Fiskivinna, sigling o.t. Fiskeri, søfart o.l.	375.709.000
§ 17. Landbúnaður og matrikulering Landbrug og matrikulering	41.195.000
§ 18. Handil, ídnaður v.m. Handel, industri m.v.	37.874.000
§ 19. Almenn forsorg Socialvæsen	294.917.000
§ 20. Pensjónsútreiðslur Pensionsudgifter	5.615.000
§ 21. Effektivar veðhaldsbindingar Effektive garantiforpligtelser	80.000.000
§ 22. Aðrar og óvissar útreiðslur Andre og uvisse udgifter	3.735.000
§ 23. At leggja í ymsar grunnar v.m. Henlæggelser til forskellige fonds m.v.	40.220.000
§ 24. Avdráttir av lánum Afdrag på lån	19.000.000
§ 25. Avskrivingar Afskrivninger	60.200.000
§ 26. Ymsar ognarútreiðslur Diverse ejendomsudgifter	300.000
Tilsamans / Ialt	1.694.687.000
Meirinntøka / Merindtægt	242.983.000
	1.937.670.000

Yvirlit yvir flytingar á ognar- og kapitalkonti í fíggjarárinum 1987
Oversigt over bevægelser på formue- og kapitalkonti i finansåret 1987

		Brutto inntøka indtægt kr. (1.000)	Brutto útreiðsla udgift kr. (1.000)	Netto inntøka indtægt kr. (1.000)	Netto Útreiðsla udgift kr. (1.000)
§ 30.	Kassakonto ..... Kassekonto		265.105		265.105
§ 31.	Virðisbrøv ..... Værdipapirer		750		750
§ 32.	Útlán ..... Udlån	9.575	7.000	2.575	
§ 33.	Inntøkueftirstøður ..... Indtægtsrestancer		27.000		27.000
§ 34.	Aktiv hjá grunnum .... Aktiver tilhørende fonds	335.310	524.000		188.690
§ 35.	Aktivir hjá deponentum Aktiver tilhørende deponenter		60.000		60.000
§ 36.	Millumrokningar tilgóðar ..... Mellemregning til gode	79.117	134.130		55.013
§ 37.	Fastar ognir og anlegg .. Fast ejendom og anlæg	4.550	1.000	3.550	
§ 38.	Skip ..... Skibe	16.500		16.500	
§ 39.	Millumrokning við nýtt fíggjarár ..... Mellemregning med nyt finansår	120.000	24.500	95.500	
§ 40.	Millumrokning, skuld .. Mellemregning, gæld	800		800	
§ 41.	Lán ..... Lån	19.000		19.000	
§ 42.	Deposita ..... Deposita	15.000		15.000	
§ 43.	Grunnar ..... Fonds	527.350	338.700	188.650	

		Brutto inntøka indtægt kr. (1.000)	Brutto útreiðsla udgift kr. (1.000)	Netto inntøka indtægt kr. (1.000)	Netto útreiðsla udgift kr. (1.000)
§ 44.	Burturlegg. og avskr. ... Henlæggelser og afskr.	19.000	46.000		27 000
§ 45.	Kapitalkonto ..... Kapitalkonto	281.983	0	281.983	0
		1.428.185	1.428.185	623.558	623.558

Inntøkur:
Indtægter:

Landskassans inntøkur í fíggjarárinum 1987 verða mettar sum tilskilað í §§ 1-8.
I finansåret 1987 beregnes landskassens indtægter som anslået i §§ 1-8.

		Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
§ 1.	Skattir			
	Skatter			
1201	Vanligur landsskattur ..... Sædvanlig landsskat	625.217	831.190	975.000
1507	Sjómansskattur ..... Sømandsskat	8.643	8.000	8.000
1702	Rentuskattur ..... Renteskatt	12.270	12.500	14.000
1804	Vegskattur ..... Vejskatt	15.391	16.000	18.000
		661.521	867.690	1.015.000

		Rokuskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
§ 2.	Toll- og framleiðslugjøld:			
	Told- og fremstillingsafgifter:			
2017	Tollgjøld	491.019	657.000	950.000
	Toldafgifter			
2708	Framleiðslugjøld	18.130	21.000	22.000
	Fremstillingsafg.			
2805	Brennioljugjald	-	-	100.000
	Brændselsolieafg.			
2807	Í oljugrunn	-	-	100.000
	I oliefond			
		509.149	678.000	972.000
§ 3.	Onnur gjøld:			
	Andre udgifter:			
3052	Gjøld fyri spiritusskamtanarkort	181	150	200
	Afgifter for spiritusrationeringskort			
3102	Loyvisgjøld	68	150	90
	Afgifter for bevillinger			
3204	Arvagjøld	1.234	1.200	1.300
	Arveafgifter			
3256	Leslugjald	51	80	80
	Skibsafgift			
3501	Bøtur	26	10	30
	Bøder			
		1.560	1.590	1.700
§ 4.	Inntøkur av spæli:			
	Indtægter ved spil:			
4011	Avlop av happadrátti	576	550	550
	Overskud ved lotteri			
4058	Burturlutingargjøld	191	100	100
	Afgifter af lotteri			

		Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
4096	Gjøld av øðrum vinningum Afgift af andre gevinster	490	450	450
		1.257	1.100	1.100
§ 5.	Rentur og vinningsbýti v.m.:			
	Renter og udbytte m.v.:			
5105	Rentuinntøkur ..... Renteindtægter	20.855	19.000	19.000
5207	Rentuútreiðslur ..... Renteudgifter	÷52.628	:65.000	: 54.545
		÷31.773	: 46.000	÷-35.545
§ 6.	Landsstovnar:			
	Landsvirksomheder:			
6009	Tyrlutænastan ..... Helikoptertjenesten:	-	-	÷9.000
6014	Strandfaraskip Landsins .. Lagtingets kystfart	÷52.931	÷52.000	÷40.500
6033	Bygdaleiðir ..... Bygdaleiðir	÷12.251	÷17.000	÷19.500
6102	Tjaldurs Apotek ..... Tjaldurs Apotek	1.253	232	310
6204	Telefonverkið ..... Telefonvæsenet	÷31.600	÷30.284	39.000
6306	Útvarpið ..... Radiofonien	÷1.725	÷4.886	0
6311	Sjónvarp Føroya ..... TV	-	÷621	0
6358	Postverkið ..... Postvæsenet	÷1.134	: 1.500	: 2.790
6408	Oljugoymslur ..... Olieanlæg	831	1.200	1.200
6567	Hvalastøðin við Áir ..... Hvalstationen við Áir	÷231	: 200	÷265

		Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
6572	Stórahús við Áir ..... Det store hus við Áir	÷5	÷45	÷45
		÷97.793	÷105.104	÷31.590
§ 7.	Partur av avlopi danska tjóðarbankans samb. lóg: Andel i den danske nationalbanks overskud iflg. lov:			
7011	Partur av avlopi danska tjóðarbankans smb. lóg ..... Andel i den danske Nationalbanks overskud iflg. lov	31.438	15.000	15.000
§ 8.	Ymsar inntøkur: Diverse indtægter:			
8105	Ymsar inntøkur ..... Diverse indtægter	0	5	5
		1.076.359	1.412.285	1.503.760

Útreiðslur:
Udgifter:

Landskassans útreiðslur í fíggjarárinum 1987 ætlast sum tilskilað í §§ 10-26.
I finansåret 1987 anslås landskassens udgifter som anført i §§ 10-26.

		Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
§ 10.	Løgtingið: Lagtinget:			
100118	Løgtingsmenn ..... Lagtingets medlemmer	5.407	7.274	7.370
10106	Løgting ..... Lagtingsbygning	404	950	1.100

		Rokn.skapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
10208	Løgtingstíðindi, Kunngerðasavn ..... Lagtingstidende, Kundgørelsessamling	209	588	600
10301	Grannskoðan (extern) ..... Revision (extern)	51	90	95
10403	Grannskoðan (intern) ..... Revision (intern)	1.156	1.633	2.113
10505	Landsskattanevnd ..... Landsskatteudvalg	83	100	100
10607	Norrønt Ráð ..... Nordisk Råd	1	75	75
10709	Norrønt samstarv ..... Nordisk samarbejde	7	75	75
10714	Menningargrunnur Útnorðurs ..... Vestnordenfonden	-	-	150
		7.318	10.785	11.678
§ 11.	Landsfyrisitingin:			
	Landsadministrationen:			
11015	Løgmaður og landsstýri ... Lagmand og landsstyre	2.018	2.602	2.672
11053	Landsskrivstova ..... Landskontor	5.750	8.350	10.800
11103	Fiskivinnustova ..... Fiskerikontor	528	803	818
11155	Uttanríkistænasta í Aberdeen ..... Udenrigstjeneste i Aberdeen	586	741	663
11205	Uttanríkistænasta í Keypmannahavn ..... Udenrigstjeneste i København	514	693	872
11219	Líkningarráðið, N. deild ... Ligningsråd, N. afd.	-	974	1.482

		Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
11224	Líkningarráðið, S. deild .... Ligningsråd S. afd.	-	489	934
11257	Líkningarráð ..... Ligningsråd	17.135	23.325	26.370
11262	Samtíðarskattaskipan ..... Kildeskatteordning	4.114	-	-
11276	Dataeftirlit ..... Datakontrol	73	204	225
11307	Manntalsstova ..... Folkeregister	615	979	989
11359	Almannastova ..... Socialforvaltning	5.501	7.824	11.931
11409	Landsskúlafyrisitingin ... Landsskoleadministrationen	4.170	8.911	9.398
11452	Føroya Gjaldstova ..... Færøernes oppebørsels-kontor	14.913	18.521	17.927
11466	Gjaldstovudeild í Klaksvík ..... Oppebørselsfilial i Klaksvík	562	763	772
11471	Gjaldstovudeild í Saltangará ..... Oppebørselsfilial i Saltangará	427	660	758
11485	Gjaldstovudeld í Fuglafirði ..... Oppebørselsfilial i Fuglafirði	324	479	462
11499	Gjaldstovudeild á Tvøroyri . Oppebørselsfilial i Tvøroyri	423	629	645
11502	Gjaldstovudeild í Vági .... Oppebørselsfilial í Vági	326	470	474
11516	Gjaldstovudeild í Sørvági .. Oppebørselsfilial í Sørvági	293	430	429
11549	Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald ..... Kontorholdsgodtgørelse til sysserne	67	65	65

		Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
11554	Tolleftirlit ..... Toldvæsen	2.661	3.670	4.761
11568	Trygdareftirlit ..... Sikkerhedstilsyn	187	322	380
11604	Valuta- og prísráð ..... Valuta og Prisråd	726	1.046	1.122
11656	Lønarráð ..... Lønningsråd	3	4	4
11661	Heilsu- og heimasjúkrasystraumsitingin ..... Administration af sundheds- og hjemmesygeplejeordningen	345	830	1.220
11703	Búskaparráð ..... Økonomisk råd	277	403	407
11709	Hagdeildin ..... Statistisk kontor	1.847	2.524	3.332
11725	Stovnseting av landsbanka v.m. ..... Etablering af landsbank m.v.	-	1.250	4.000
11758	Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands ..... Rejse- og dagpenge inden- og udenlands	3.682	3.100	3.500
11808	Innheintingarútreiðslur ... Udgifter ved inkasso	86	80	100
11851	Ognin Tinganes ..... Ejendommen Tinganes	1.507	1.968	2.010
11901	Landsverkfrøðingsskrivstova ..... Landsingeniørens kontor	7.325	10.541	10.994
11953	Umsitingarbús í grunn ... Administrationsbygning i fond	1.500	500	1.000
		78.485	102.687	121.516

			Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. (1.000)	Játtan 1986 kr. (1.000)	Játtan 1987 kr. (1.000)
§ 12.		Heilsunál Sundhedsvæsen			
	12109	Landssjúkrahúsið (D.A.H.) . Landssygehuset (D.A.H.)	63.809	80.107	81.125
	12202	Klaksvíkar sjúkrahús .... Klaksvík sygehus	16.276	17.224	18.735
	12304	Suðuroyar sjúkrahús ..... Suderø Sygehus	11.266	9.122	10.149
	12310	Játtan til sjúkrahúsverkið .. Bevilling til sygehusvæsenet	-	-	6.000
	12406	Heilsumiðstøðir í grunn ... Sundhedscentre, henlagt i fonds	1.500	2.000	2.000
	12508	Læknar ..... Læger	460	677	622
	12513	Amanuensis ..... Amanuensis	-	-	100
	12653	Heilsu- og heimasjúkrasystraskipan ..... Sundheds- og hjemmesygeplejeordning	3.348	4.056	4.475
	12672	Skúlalæknaskipan ..... Skolelægeordning	110	160	160
	12907	Ymiskar útreiðslur: Diverse udgifter:			
		303011 Farsóttir ..... Epidemiske sygdomme	12	70	70
		303044 Hvíldarheim. »Naina.« ..... Hvilehjemmet »Naina«	600	900	1.000
2. viðgerð 29. oktober. Uppskotið varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
8. Útvarp Føroya, 1. apríl - 31. dec. 1985.

Ár 1986, týsdagin 28. oktober løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Útvarpi Føroya fyri tíðarskeiðið 1. apríl til 31. dec. 1985.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapin hjá Útvarpi Føroya fyri omanfyri nevnda tíðarskeið og ásannað, at roknskapargrannskoðanin á stovninum er farin fram samsvarandi reglunum.

Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at Løgtingið framhaldandi hevur givið Útvarpinum loyvi at reka V4-spæl, eins og tilmælt í seinasta áliti.

Roknskaparliga úrslitið hjá Útvarpinum er eitt yvirskot uppá kr. 125.849,01. Hetta yvirskot kemur m.a. av, at roknskapurin bert fevnir um 3/4 ár. Stórir avdráttir falla í 1. ársfjórðingi og sostatt eru avdráttirnir hjá Útvarpinum minni enn teir høvdu verið í einum heilum roknskaparári.

Ein meiriluti: Thomas Arabo og
Karin Kjølbro

meinar framvegis, eins og í seinasta áliti, at løgtingið eigur at taka støðu til, hvussu stórjáttanin á fíggjarlógini skal verða, í mun til rentur og avdráttir. Sami meiriluti meinar, at rentur og avdráttir áttu at verið goldin beinleiðis úr landskassanum, tí, um útvarpsgjaldið verður sett so høgt, at hetta eisini skal kunna gjalda rentur og avdráttir (í løtuni umf. 4,5 mill. kr. árliga) verður hetta ov høgt tann dag, tá ið lánibyrðan er burtur.

Ein minniluti: Flemming Mikkelsen og
Óli Breckmann

førir fram, at miðað eigur at verða ímóti, at stovnurin hvílir í sær sjálvum, bæði viðvíkjandi rakstri og rentum og avdráttum.

Í seinasta álitI átaladu grannskoðararnir álvarsliga, at eio rokning frá 1975 frá Telefonverkinum ikki var avgreidd. Hetta er heldur ikki gjørt nú, og tí seta løgtingsgrannskoðararnir fram fylgjandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fáa fíggjarligu viðurskiftini millum Telefonverk Føroya Løgtings og Útvarpið í rætt lag.

GRANNSKOÐARADEILD
LANDSKASSANS

Tann, 31.10.1986

Føroya Løgting

Viðvíkjandi álitI í løgtingsmáli nr. 6 - 8/1986 Útvarp Føroya 1/4 til 31/12-1985.

Viðmerkingar

Samsvarandi fíggjarløgtingslógini 1/4 til 31/12 1985 eru kr. 1.725.000, avsett ar bæði undir gr. 6 (og krediteraðar undir gr. 23).

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslógina árið 1987 er hetta tal (undir teiginum roknskapur 1/4 til 31/12-1985) óbroytt. Orsøkin til hetta stendst av, at yvirskotið hjá Útvarpinum 1/4 til 31/12-85 kr. 125.849,01 ikki varð bókað á F. Gjaldstovu, tá fíggjarlógaruppskotið varð gjørt.

Yvirskotið kr. 125.849,01 er bókað á F. Gjaldstovu tann 22. sept. 1986.

Á fíggjarløgtingslógini 1985 eru undir gr. 15 játtaðar kr. 2.500.000,- til Útvarp Føroya til avdráttir av lánum.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslógina árið 1987 er hetta tal (undir teiginum roknskapur 1/4 til 31/12-1985) sett upp við kr. 900.000,-.

Orsøkin til hetta er manglandi umbóking uppá kr. 1.600.000,- debet gr. 15 og kredit konto veðhaldsútlegg.

Føroya Landsstýri er við skrivi frá revisjónini dagf. 27. juni 1986 biðið um at geva Gjaldstovuni boð um hesa umbóking.

Við heilsu
Ólavur Olsen

2. viðgerð 4. november. Uppskotið varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
9. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna,
Ráfiskagrunnurin og Trygdargrunnur Veiðimanna.

Ár 1986, týsdagin 28. oktober løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá

1. Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna 1983/84, 1984/85 og 1/4 til 31/12-1985.
2. Ráfiskagrunnurin 1983/84, 1984/85 og 1/4 til 31/12-1985.
3. Trygdargrunnur Veiðimanna 1983/84, 1984/85 og 1/4 til 31/12-1985.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum
Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna fyri omanfyri nevndu tíðarskeið og ásanna, at roknskapargrannskoðanin av grunninum er í lagi.

Útreiðslur grunnsins hesi nevndu roknskaparár hava verið ávíkavist umt. 180, 312 og 170 mill. kr., seinasta talið er galdandi fyri 9 mánaðir.

Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at útreiðslurnar hjá grunninum tykjast at broytast í samsvar við fyritreytirnar hjá fiskiflotanum annars at klára seg. Her verður hugsað um fiskaprísir, oljuprísir o.s.fr. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at likviditetsstýringin millum grunnin og landskassan er so vánalig, at grunnurin hesi árini hevur havt ávíkavist 1, 7, 4, 8 og 7,7 mill. kr. í rentuútreiðslum.

Løgtingsgrannskoðararnir heita á løgtingið um at áleggja landsstýrinum at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Løgtingsgrannskoðararnir gera var við, at minstiforvinningurin, útgoldin til útróður, er skjótt vaksandi. Upplýst er fyri nevndini, at spurnartekin kann setast, um hesin forvinningur virkar sum ætlað í lógini. Løgtingsgrannskoðararnir meina, at lógin eigur at verða endurskoðað, soleiðis at reglurnar verða greiðar.

Ráfiskagrunnurin

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Ráfiskagrunninum fyri áðurnevndu tíðarskeið og ásanna, at roknskapargrannskoðanin er í lagi.

Studningurin fyri hesi tíðarskeið hevur verið ávikavist umleið 71, 100 og 65 mill. kr. Tað seinasta talið er fyri teir 9 mánaðirnar í 1985.

Løgtingsgrannskoðararnir halda tað vera óheppið, at í tíðarskeiðunum hevur verið ein vøkstur, bæði í skuld til virkir og í tí, sum grunnurin eigur útistandandi hjá virkjum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fingið vissu fyri at arbeitt verður fyri at fáa hetta í rættlag.

Trygdargrunnur Veiðimanna

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Trygdargr. Veiðimanna fyri omanfyri nevndu tíðarskeið og ásanna, at grannskoðanin av roknskapum grunnsins er farin fram samsvarandi reglunum.

Ogn grunnsins er frá 1. apríl 1983 økt úr umk. 1,3 mill. kr. til 3,6 mill. kr. tann 31. dec. 1985.

Trygdargrunnurin hevur ongar útgjaldingar havt í omanfyri nevndu tíðarskeiðum.

Grunnurin veitir trygd fyri ágóða hjá skipum og veiðimonnum við upp til 90% av ágóðanum.

Løgtingsgrannskoðararnir eru av teirri fatan, at grunnurin átti at havt meiri víttfevnandi virksemi, í hvussu er átti hann at umfata trygd fyri fólk, ið eru í vinnu hjá flakavirkjunum.

Løgtingsgrannskoðararnir eru vitandi um, at landsstýrið arbeiðir við hesum spurningum, og vóna, at úrslitið av hesum arbeiði skjótt kann leggjast fyri tingið.

2. viðgerð 4. november. Uppskotið varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
10. Húsalánsgrunnurin, Íbúðargrunnurin,
Bjálvingarstuðulslánsgrunnur.

Ár 1986, týsdagin 28. oktober løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá:

1.	Húsalánsgrunninum	1. apríl - 31. december 1985
2.	Íbúðagrunninum	1. apríl - 31. december 1985
3.	Bjálvingarstuðulslánsgr.	1. apríl - 31. december 1985

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá omanfyri nevndu grunnum fyri omanfyri nevnda tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunnunum er kannað og at roknskapargrannskoðanin hevur fingið vissu fyri, at roknskapir og tann fíggjarliga støðan hjá øllum grunnunum er í lagi.

Viðvíkjandi Húsalánsgrunninum

Húsalánsgrunnurin hevur í tíðarskeiðinum eitt hall uppá umleið kr. 950.000,-. Hetta hall kemur partvís av, at omanfyri nevnda tíðarskeið bert fevnir um 9 mánaðir og ikki eitt heilt roknskaparár.

Í seinasta áliti gjørdu løgtingsgrannskoðararnir vart við, at undantaksreglur áttu at kunna verið fyri støddum á húsum, ið kundu fáa lán úr Húsalánsgrunninum, tá talan var um t.d. avlamisfólk.

Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at hetta er broytt, so møguleiki er skaptur fyri hesum undantøkum.

Viðvíkjandi hølisviðurskiftunum hjá Húsalánsgrunninum eru løgtingsgrannskoðararnir nøgdir við, at hesin spurningur nú endaliga sær út til at vera loystur.

Viðvíkjandi Bjálvingarstuðulslánsgrunninum

Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at útlánsmarkið frá Bjálvingarstuðulslánsgrunninum nú er hækkað úr kr. 25.000,- upp í kr. 45.000,-, samstundis sum inntøkukrøvini hjá teimum, ið hava møguleika fyri at lána úr hesum grunni er hækkað úr kr. 40.000,- upp í kr. 70.000,-.

Viðvíkjandi íbúðargrunninum

Løgtingsgrannskoðararnir halda framvegis, at lógin er ógreið at arbeiða eftir. Nevndin er nøgd við, at landsstýrið arbeiðir við málinum. Samstundis verður heitt á landsstýrið um at skunda undir, so hetta mál verður avgreitt soleiðis, at Íbúðargrunnurin kann virka betur í tráð við tær ætlanir, sum lógu aftanfyri stovnsetanina av hesum grunni.

Viðvíkjandi figgjar- og lániviðurskiftunum hjá øllum grunnunum

Sum ávíst fyri, so er grannskoðaranevndin í høvuðsheitum av tí áskoðan, at játtanir á figgjarlógini eiga at verða so mikið stórar, at lán framhaldandi kunnu verða so bílig, sum tey eru nú, og at lániupphæddirnar til húsabygging eiga í hvussu so er at fylgja prístalsvøkstrinum.

Løgtingsgrannskoðararnir heita á landsstýrið um at bera so í bandi, at Húsalánsgrunnurin fær møguleika fyri heilt bíligum lánum úr teimum grunnum, ið peningur nú kemur í, frá teimum nýggju inntøkulógunum.

2. viðgerð 4. november. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
11. Føroya Jarðargrunnur.

Ár 1986, týsdagin 28. oktober løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Jarðargrunni fyri figgjarárini 1983/84 og 1984/85.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapirnar hjá Føroya Jarðargrunni fyri omanfyri nevndu tíðarskeið og fingið trygd fyri, at roknskapargrannskoðanin á stovninum er farin fram samsvarandi reglunum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fyrr gjørt vart við, at roknskaparhátturin hjá grunninum eigur at verða broyttur og nútímansgjørdur. Millum annað eigur núverandi kontoplanur at verða endurskoðaður soleiðis, at hann verður meira tíðarhóskandi. Arbeiðið tykist ganga alt ov seint og átala løgtingsgrannskoðararnir hetta.

Í roknskapinum er ein útreiðsla uppá uml. kr. 72.000,, ið eitur »Reinsiverk til Sandsvatn«. Støðan viðvíkjandi hesi íløgu er í dag tann, at Jarðarráðið eigur amboð til eitt reinsiverk, sum ikki er uppsett. Hetta er partvís orsakað av, at ein avtala við Føroya Sílaveiðifelag ikki hevur hildið.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at almennir stovnar gera avtalur við feløg, sum ikki verða so væl orðaðar, at ikki báðir partar kunnu ábyrgjast fyri tap av almennum peningi.

Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at Jarðarráðið nú ger meira fyri at fáa avdráttar- og leigueftirstøður inn.

Annars meina løgtingsgrannskoðararnir, at ein nútímansgerð av allari lóggávu viðvíkjandi Føroya Jarðargrunni og Føroya Jarðarráðið er ynskilig, og heitir nevndin á Løgtingið um at hetta verður gjørt sum skjótast.

2. viðgerð 4. november. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum
12. Sjónvarp Føroya

Ár 1986, týsdagin 2. december løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Sjónvarpi Føroya fyri tíðarskeiðið 1/4-31/12-1985.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi omanfyri nevnda roknskapi:

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapin hjá Sjónvarpi Føroya fyri omanfyri nevnda tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfar hjá Sjónvarpi Føroya eru kannað og í lagi.

Sjónvarp Føroya er stovnsett sambært lóg nr. 77 frá 1982.

Sambært hesa lóg er vald sjónvarpsnevnd við 5 limum og verða teir valdir av løgtinginum á hvørjum fyrsta tingi aftaná løgtingsval.

Landsstýrið og fíggjarnevnd leggja fíggjarliga karmin hjá sjónvarpinum við ásetan av sjónvarpsgjaldi.

Sjónvarpsnevndin tekur avgerð innan hendan fíggjarkarm, hvussu dagsskrá sjónvarpsins í høvuðsheitinum skal skipast bæði viðvíkjandi dygd og longd. Landsstýrið hevur, saman við løgtingsins fíggjarnevnd, sambært hesa lóg avgerðarrættin og ávbyrgd av øllum fíggjarligum viðurskiftum í sjónvarpinum.

Soleiðis fyriskrivar lógin, at fyristøðumaðurin í Sjónvarpinum ger uppskot til fíggjarætlan fyri fíggjarárið, og sendir landsstýrinum uppskotið til góðkenningar.

Løgtingsgrannskoðararnir eru av teirri áskoðan, at hetta er greið skipan, ið býtir ábyrgdina upp soleiðis, at fíggjarábyrgdin liggur hjá landsstýrinum, meðan sjónvarpsnevndin hevur ábyrgd av tí, ið sent verður.

Annars halda løgtingsgrannskoðararnir at reglugerðin, ið er tann sama sum fyri Útvarpið og er frá 1957, eigur at verða endurskoðað og broytt eitt sindur. M.a. heldur nevndin, at tað er óheppið, at fyristøðumenninir fyri Útvarpið og fyri Sjónvarpið hava fast sæti á fundum í ávíkavist Útvarps- og Sjónvarpsnevnd.

Eisini halda grannskoðararnir, at heimildarbýti ímillum nevnd og dagliga leiðslu kundi verið greiðari, soleiðis at allar dagligar avgerðir liggja hjá leiðsluni.

Sum nevnt, so verða rakstrarútreiðslurnar hjá Sjónvarpinum fingnar til vega við Sjónvarpsgjaldi, meðan íløgurnar verða goldnar úr Sjónvarpsgrunnunum.

Sjónvarpsgrunnarnir eiga tvinnar húsaognir. Onnur ognin verður í dag nýtt til virksemi hjá sjónvarpinum, meðan hin, ið er gamla Útvarpshúsið á Bryggjubakka, ikki verður nýtt av Sjónvarpinum.

Formligu viðurskiftini viðvíkjandi hesari húsaogn er ikki enn í lagi, tí Útvarp Føroya stendur framvegis skrásett sum eigari av húsinum.

Eink er gjørt við bygningin síðani Útvarpið flutti út. Í bygninginum eru í dag lutvíst deildir hjá Gjaldstovuni, privatir stovnar og aðrir smærri partar av landsumsitingini.

Felags fyri allar eru, at eingin rindar leigu fyri at verða har, eingi høli eru veruliga innrættað til tað endamál, tey verða nýtt til. Bert neyðturviligar istandsetingar eru gjørdar.

Sum ávíst í seinasta áliti halda løgtingsgrannskoðararnir, at tað líkist ongum og eigur løgtingið at áleggja landsstýrinum at fáa skil á hesum viðurskiftum.

Tá ið ein ættan skal gerast yvir, hvat henda húsaogn skal nýtast til, halda løgtingsgrannskoðarnir, at havt eigur at vera í huga, at húsini møguliga eiga at innrættast til løgtingsgrannskoðaradeildina, nú tað sær út til, at løgtingsskrivstovan verður sett á stovn og kemur at nýta hølini á gamla apoteki.

Viðvíkjandi inntøkum hjá sjónvarpinum eru hesar munandi hækkaðar í 1985. Orsøkin er partvis, at tað eru fleiri sjónvarpsmótfakarar skrásettir í hesum ári, og partvís at sjónvarpsgjaldið varð hækkað úr kr. 50,- um mánaðin til umleið kr. 65,-.

Útreiðslurnar av sendistøðum eru í hesum tíðarskeiði 354.000,- kr. og fevnir hetta um viðlíkahald, sum Telefonverkið ger fyri Sjónvarpið.

Harafturat verður nakað av íløguarbeiði gjørt av Telefonverkinum. Hetta verður fíggjað beinleiðis úr Sjónvarpsgrunnunum.

Verkstað og studioútreiðslur, ið er viðlíkahald, ið Sjónvarpið sjálvt ger, eru økt ar frá 172.000,- kr. til 415.000,- kr. Orsøkin er hon, at nakað av nýggjum tólum er fíggjað yvir hesa konto.

Størri íløgur eru fíggjaðar úr Sjónvarpsgrunnunum.

Upplýsast kann, at samlaðu íløgur úr hesum grunnum í tíðarskeiðinum vóru góðar 2 mill. kr.

Lønarútreiðslurnar eru í tíðarskeiðnum økt ar úr 1.677.000,- kr. upp í 2.385.000,- kr., og kemst hetta í høvuðsheitinum av, at starvsfólkatalið er økt.

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað normeringarnar í Sjónvarpinum, og tað er upplýst, at í fíggjarárinum 1984/85 vóru 3 føst støv í Sjónvarpinum. — Stjóri, tekniskur leiðari og umsitingarleiðari. — Harafturat vóru 8 fólk í fyribilsstarvi, umframt leys hjálp. Hesi 3 nevndu føstu støv eru normerað í 1983 og 1984.

2. apríl 1985 vóru 8½ støv normerað. 20. juni 1985 vóru 5 støv normerað og 6. juni 1986 vóru 3 støv normerað. Sostatt er normerøða starvsfólkatalið á Sjónvarpinum í dag 19½ støv.

Viðvíkjandi lønum goldnar til Danmark Radio 284.000,- kr. er at siga, at Sjónvarp Føroya á sama hátt sum Grønlands Radio lønar 1½ teknikara fyri upptøku arbeiði á Danmarks Radio.

Samsýningar v.m. fevnir um t.d. kórsangarar, luttakarar í spurnarkappingum o.s.fr.

Bíløt og grafiskt arbeiði v.m. 222.000,- kr. fevnir um m.a. keyp av programmum frá privatum føroyskum feløgum.

Ferðaútreiðslur eru 159.000,- kr., og halda løgtingsgrannskoðararnir, at hetta er skilagott at lata stovnin hava sína egnu ferðaútreiðslukonto. Henda upphædd fevnir um ferðaútreiðslur viðv. upptøkum bæði innan- og uttanlands.

Viðvíkjandi stjórnarútreiðslum eru húsaútreiðslurnar økt ar frá 187.000,- kr. upp í 296.000,- kr. Hetta umfatar partvís umbygging av teimum hølum, sum í dag verða nýtt. Størri umbyggingar, ið eisini eru gjørdar í sama tíðarskeið, eru konteraðar út á sjónvarpsgrunnarnar.

Viðvíkjandi tí, ið varð ávist í seinasta álitið frá løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi postgjøldum og frakt av bondum flutt úr Danmark, so er upplýst fyri nevndini, at arbeitt verður við at sleppa undan hesari útreiðslu við at taka sendingar beinleiðis frá fylgisveini.

Gjald til Danmark Radio 227.000,- kr. er upphavsrættur.

Útbúgving 39.000,- kr. er ein upphædd, ið ikki er stór, men hevur nevndin fingið upplýst, at henda upphædd kann væntast at økjast í komandi árum.

Viðvíkjandi rentuútreiðslum so er tað, sum Grannskoðaranevndin eisini í øðrum sambandi hevur víst á, átaluvert,at landsstovnar hava stórar rentuútreiðslur, samstundis sum landskassin eigur pening í peningastovnum fyri lága rentu.

Grannskoðaranevndin er av teirri áskoðan, at ein loysn eigur at finnast á hesum spurningi, soleiðis at landskassin kann tryggja stovninum so mikið góðan likviditet, at sleppast kann undan hesum rentuútreiðslum.

Skulu tað gjaldast rentuútreiðslur, kundu tær verið goldnar til landskassan.

Viðvíkjandi viðmerkingini, ið roknskapargrannskoðarin hevur um ferðaforskot í Sjónvarpinum, hevur grannskoðaranevndin fingið vissu fyri, at hetta er komið í rættlag, við at skyldugt ferðaforskot verður trekt av lønini hjá medarbeiðarum. Grannskoðaranevndin heldur, at hetta er ein loysn, ið skuldi verið umhugsað aðrastaðni í landsumsitingini.

1. viðgerð 10. december. Málið varð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 12. december. Uppskotið varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
13. Telefonverk Føroya Løgtings.

Ár 1986, týsdagin 2. december legði grannskoðannarnevndin fram soljóðandi

Álit

Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

1. Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyristandandi roknskap hjá Telefonverki Føroya Løgtings fyri fíggjarárini 1983/84 og 1984/85.

2. Løgtingið áleggur landsstýrinum at bera so í bandi, at vørugoymsla á T.F.L. verður fullfiggjað uppgjørd.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at roknskapargrannskoðanin er farin fram samsvarandi reglunum. Peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá stovninum er kannað, eins og roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at roknskapur og figgjarstøða verksins eru rætt uppsett sambært bókhaldinum.

Í frágreiðingini frá løgtingsgrannskoðarunum fyri árið 1982/83 varð gjørt vart við, at vørugoymslan ikki var nóg fullfiggjað uppgjørd, sum hon átti at vera. Hetta sama ger seg galdandi fyri árini 1983/84 og 1984/85.

Roknskapurin eftir avskrivingar í 1983/84 vísir eitt hall uppá góðar 31 mió. kr. og fyri 1984/85 eitt hall uppá góðar 11 mió. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir gera vart við, at eginognin eins og í 1982/83 er negativ. Meðan hon í 1982/83 var góðar 9 mió. kr., er hon í 1983/84 góðar 40 mió. kr. Í 1984/85 er eginognin negativ við 51,6 mió. kr.

Um støðu stovnsins er annars at siga, at størsti parturin av samlaðu skuldini er langfreistað lán, í 1983/84 umleið 265 mió. kr. og í 1984/85 umleið 256 mió. kr. Stuttfreistaðu lánini í sama tíðarskeið 1983/84 umleið 17 mió. kr. og í 1984/85 umleið 18 mió. kr.

Uttanlandslánini eru uppsett í upprunakursum. Um dagskursurin verður óbroyttur, tá lánini falla til gjaldingar, kemur Telefonverkið at staðfesta kurstap av níverandi lánum við góðum 64 mió. kr. fyri 1983/84 (kursirnir hin 31/3 1984) og fyri árið 1984/85 100,2 mió. kr. (kursirnir hin 31/3 1985).

Eitt langfreistað bræva lán er afturgoldið í 1983/84 og eitt í 1984/85.

Eingi nýggj lán eru annars upptikin í 1984/85. Í 1983/84 varð tikið eitt uttanlandslán uppá 4 mió. kr.

Um langfreistaðu uttanlandslánini er at siga, at eingin avdráttur er goldin av teimum trimum dollaralánunum og tí eina SDR-láninum.

Inntøkurnar hjá Telefonverkinum eru øktar frá 1982/83 úr umleið 48 mió. kr. til umleið 65 mió. kr. í 1983/84. Í sama tíðarskeiði minka útreiðslurnar frá 24 mió. kr. til umleið 22,7 mió. kr. Í árinum 1984/85 økjast inntøkurnar hjá Telefonverkinum til umleið 70 mió. kr., meðan útreiðslurnar økjast munandi úr umleið 21,7 mió. kr. til 28,6 mió. kr. Orsøkin er, at útreiðslurnar til tekniska raksturin økjast við nærum 50%. Um henda spurning upplýsir stjórin á Telefonverkinum, at vøksturin frá 1982/83 til og við 1984/85 er um 26% tilsamans, ella um 13% fyri árið. Hetta stendst av vanligari príshækkan við um 7% og vøkstur av telefonfelagum, sum er um 7% fyri árið.

Meðan úrslitið áðrenn rentur og avskriving er økt á hvørjum ári síðani 1979/80, vísir 1984/85 eitt hall í yvirskotinum. Í 1983/84 var talið umleið 43,5 mió. kr., meðan tað í 1984/85 er umleið 41 mió. kr.

Í 1982/83 gjørdu løgtingsgrannskoðararnir vart við útreiðslurnar til stjórn og sekretariat á Telefonverkinum, ið vóru tilsamans kr. 1.154.000,00. Av hesum

vóru kr. 175.000,00 nýttar til ferða- og útiliggipening og harumfrumt kr. 80.000,00 til umboðan. Í 1983/84 var talið fyri stjórn og sekretariat kr. 1.074.000,00. Av hesum vóru ferða- og útiliggipeningur kr. 143.931,00, umboðan kr. 57.176,00, og aðrar útreiðslur kr. 120.600,00. Í 1984/85 er útreiðslan til stjórn og sekretariat kr. 1.219.000,00. Ferða- og útiliggipeningur er kr. 156.572,00, umboðan kr. 109.218,00, og aðrar útreiðslur 46.478,00 kr. Løgtingsgrannskoðararnir hava fingið útgreining av útreiðslunum til ferða, útiliggipening, umboðan og aðrar útreiðslur. Mælt verður til, at hesar útreiðslur verða avmarkaðar, og at borið verður so í bandi, at allir stovnar undir landinum í ársjáttanini fáa fasta upphædd til ferða- og útiliggipening og aðrar tílíkar útreiðslur og halda seg til hesa upphædd, eisini á hesum øki. Annars verður hildið skilagott at kanna eftir, hvussu hesar útreiðslur eru á øðrum landsstovnum, og hvussu tær eru sundurgreinaðar.

Sum heild kann sigast, at tørvur er á betri fíggjarligari stýring á útreiðslunum hjá Telefonverkinum. Løgtingsgrannskoðararnir eru vitandi um, at fíggjarnevnd løgtingsins setti sum treyt fyri upptøku av nýggjum lánum, at fíggjarstjóri varð settur á Telefonverkinum. Løgtingsgrannskoðararnir taka undir við hesum og mæla til, at hetta mál fæst í rættlag sum skjótast. Samstundis eru løgtingsgrannskoðararnir vitandi um, at lántøka er farin fram, uttan at henda treyt frá fíggjarnevnd løgtingsins er uppfylt, og verður hetta álvarsliga átalað.

Løgtingsgrannskoðararnir eru varðugir við, at Telefonverkið sambært nýggja reglugerð hevur broytt tænastuskipanina á tann hátt, at avgjald verður kravt, tá ein telefon er í ólagi. Hetta kann gerast tyngjandi útreiðsla, m.a. hjá pensiónistum, og løgtingsgrannskoðararnir biðja tí landsstýrið umhugsa møguleikarnar fyri at lata pensionistar sleppa við hálvum telefongjaldi. Árliga fasta gjaldið er í løtuni kr. 924,-. Treytin fyri at fáa hesa sømd kundi t.d. verið hin sama, ið hevur verið galdandi higartil viðvíkjandi brennistudningi. Fóru vit yvir í hesa skipan og søgdu, at 3.100 fólk skulu gjalda hálvt telefongjald, so hevði hetta komið at kosta hálvaaðru mió. kr. um árið.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð heint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 10. februar. Málið varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
14. M/t »Nónhamar«.

Ár 1986, fríggjadagin 13. mars legði grannskoðannarnevndin fram soljóðandi

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapir hjá M/T NÓNHAMAR fyri 1983, 1984 og 1985.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og frágreiðing roknskapargrannskoðarans hjá M/T NÓNHAMRI fyri omanfyri nevndu tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið røttu mynd av rakstri og fíggjarstøðu skipsins við árslok 1985.

Landskassin eigur trolaran, og hevur átt hann síðan 1980. Rakstur og umsiting hevur P/F J.F.Kjølbro.

Samlaða skuldin til landskassan hjá M/T NÓNHAMRI var pr. 31. december 1983, 1984 og 1985 ávíkavist 27,2 23,8 og 19,1 milj. kr.

Trolarin hevði í árunum frá 1980 - 1984 eitt samlað hall uppá 3,7 milj. kr., meðan úrslitið í 1985 vísir eitt rakstraravlop uppá 1,9 milj. kr. Úrslitini eru uttan avskrivingar, men við rakstrarrentum.

1. viðgerð 18. mars 1987. Málið varð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 24. mars. Uppskotið samtykt við 24-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
15. Postverk Føroya.

Ár 1986, friggjadagin 13. mars legði grannskoðannarnevndin fram soljóðandi

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Postverki Føroya fyri tíðarskeiðið 1/4-1985 til 31/12-1985.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapin hjá Postverki Føroya fyri omanfyri nevnda tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar eru kannað, og at roknskapur og figgjarliga støða Postverksins er í lagi.

Roknskapartíðarskeiðið fevnir um 3/4 ár.

Í hesum tíðarskeiði var úrslitið eitt hall uppá 1.134.000,- kr. mótvegis einum halli í 1984/85 uppá 3.256.000,- kr.

Ongar serligar stórar útreiðslur til EDV-virksemi hava verið eins og í 1984/85. Inntøkurnar hjá Postverkinum, serliga á Frímerkjadeildini eru munandi fallnar. Útreiðslurnar eru eisini fallnar tó ikki í so stóran mun.

Frímerkjadeildin hevði í tíðarskeiðnum eitt yvirskot uppá 7,3 milj. kr. Stóra fallið skyldast partvís, at teir 3 mánaðirnir, ið roknskapurin ikki umfatar, er sølan vanliga betri enn restina av árinum. Annars visir tað seg sum áhugin fyri keypi og sølu av frímerkjum alsamt er minkandi, hóast tað verður gjørt eitt líka stórt søluarbeiði sum áður.

Hetta ger, at virksemið hjá sjálvari Frímerkjadeildini er í minking.

Postverkið arbeiðir ikki við nøkrum ítøkiligum ætlanum um miðspjaðing av arbeiðinum á Frímerkjadeildini. Vaksandi virksemi hevði gjørt teir veruligu møguleikarnar fyri miðspjaðing munandi betri.

Samráðingar eru framhaldandi um bygging av nýggjari postdeild í Runavík. Ætlanin er at byggja hesa deld saman við Gjaldstovuni.

Á Tvøroyri eru samráðingar við kommununa um byggjan av posthúsi. Postverkið ætlar her at byggja saman við peningastovnum.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tað vildi verið rímiligt um t.d. Gjaldstovan á Tvøroyri, ið nú heldur til í leigaðum hølum, var við í slíkari byggiaætlan.

Í Sørvági og við Gøtugjógv eru eisini fyrireikingar um byggjan av nýggjum posthúsum.

Løgtingsgrannskoðararnir fílast á, at nógvar byggjaætlanir hjá tí almenna kring landið ganga ov seint, ofta av formligum viðurskiftum. Í eini tíð har nógv verður tosað um bygdamenning og miðspjaðing skuldi verið sjálvsagt, at bygda- og býráð saman við landsmyndugleikum skundaðu undir slíkar ætlanir.

Viðvíkjandi myndugleika og arbeiðsbýti imillum stovnsleiðslu og landsstýri (kompetencoforhold) so er einki hent, hóast løgtingsgrannskoðararnir í seinasta áliti átaladu ta ógreiði, sum tykist vera millum stovnin og landsstýrið.

Slík ógreiða tykist at valda víða, serliga á samskiftisøkinum.

Løgtingsgrannskoðararnir eru vitandi um, at landsstýrið arbeiðir við einum umsitingarbygnað, grundað á stýrisdeildir (departement). Slík loysn hevði óivað bøtt um umstøðurnar.

1. viðgerð 18. mars 1987. Málið varð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 24. mars. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum rokuskapum.
16. Føroya Landskassi.

Ár 1987, mánadagin 6. apríl legði grannskoðannarnevndin fram soljóðandi

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna omanfyrinevndu roknskapir hjá Føroya Landskassa.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at roknskapargrannskoðanin er farin fram samsvarandi reglunum eins og vissa er fingin fyri, at roknskapir og fíggjarliga støða landskassans eru rætt uppsett sambært bókhaldinum.

Inntøkur landskassans í hesum tíðarskeiðum hava ávikavist verið 1.043, 1.219 og 1.442 milj. kr.

Heruppí eru roknaðar ávikavist 19, 41 og 32 milj. kr., sum er partur av avlopi danska tjóðarbankans.

Samstundis eru útreiðslurnar fyri áðurnevndu tiðarskeið ávikavist 972, 1.158 og 1.501 milj. kr.

Fyri 1982/83 fyriliggur eina eykafíggjarlóg. Tað ger tað ikki fyri hini bæði roknskaparárini. Løgtingsgrannskoðararnir átala hetta. Hildið verður, at tað hor ikki til, at ein fíggjarlóg verður gjørd og at eykaútreiðslur verða bornar av óformaliseraðum yvirtrekkum.

Viðvíkjandi tollmálum er nevndin nøgd við, at gongd er komin á arbeiðið við endurskoðan av tolllógini. Reglugerðin fyri toll-kredittinum er broytt, soleiðis at teir vansar, ið nevndin fyrr hevur vist á, viðvíkjandi avgreiðslu, nú tykjast fáa eina loysn.

Løgtingsgrannskoðararnir heita á landsstýrið um at skunda undir arbeiðið við nýggjari tollóg, soleiðis at spurningar um tariffering og tollavgreiðslu sum heild verða greiddir skjótast gjørligt.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fyrr, saman við roknskapargrannskoðarunum, gjørt var við spurningin um tryggleika viðvíkjandi kassainngjaldingum á gjaldstovnideildunum, so leingi hesar ikki nýta kassamaskinur. Einki er hent í málinum, og løgtingsgrannskoðararnir átala hetta einaferð aftur at.

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum um landskassaroknskapin varð nógv gjørt burturúr EDV-útreiðslunum á Gjaldstovuni.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at EDV nýtslan í landsumsitingini er so mikið stór, at spurningurin eigur at verða tikin upp um samskipan á hesum øki. Hetta, fyri at loysn kann finnast á teimum EDV-trupulleikum, sum ofta tykjast darva umsitingina.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at skattaskuldin til landskassan tykist at minka skjótt, men ger vart við, at B-skatturin eigur at verða soleiðis uppkravdur, at skattaskuldir frá hesum bólki ikki fara at vaksa.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at tað eru ymisk yvirtrekk á fíggjarlógini, ið kanska í upphæddum ikki eru so stór, men sum koma fyri ár eftir ár. Her skulu m.a. nevnast útreiðslur til umboðan. Løgtingsgrannskoðararnir halda, at nakað av peningi kann nýtast til umboðan, men tað sær ikki skilagott út at seta eitt lítið tal á fíggjarlógina, tá árið byrjar, og so hava nýtt tað dupulta, tá árið er at enda. Betur er at landsstýrið fær samsvar millum nýtslu og fíggjarætlan.

Sama er t.d. galdandi við játtanini til gr. 14, Ítróttur.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at alt ov lítið hevur verið sett av til grunnin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum. Somuleiðis tá talan er um grunnin fyri effektivum veðhaldum. Veðhaldini eru í tiðarskeiðunum vaksin nógv og týðiligt er, at stórar upphæddir skulu gjaldast tí veðhald eru verðin effektiv.

Løgtingsgrannskoðararnir átala harðliga, at lítið og einki hendir við teimum útleggum, sum landskassin hevur havt. Yvirlitið yvir teir, sum útlagt er fyri, vísir, at fleiri av feløgunum eru farin á húsagang fyri langt síðani. Heitt verður á

landsstýrið at skunda undir eina uppruddingí hesum útleggum og annars fáa kravt inn tað sum er møguligt at fáa inn.

Løgtingsgrannskoðararnir undrast á tær skipanir, sum eru galdandi viðvíkjandi tí, at læknar, ay ymiskum slag, kunnu nýta landsins tól og hentleikar annars til privata vinnu. Løgtingsgrannskoðararnir eru av teirri áskoðan, at inntøkur, ið verða vunnar á henda hátt, áttu at farið til viðkomandi stovn. Reglur á hesum øki treingja í øllum føri til at verða endurskoðaðar.

Løgtingsgrannskoðararnir eru varugir við, at tað tykist vera ógreitt viðvíkjandi t.d. rækju- og svartkjaftamaskinunum, ið eru keyptar til ávísur royndir. Greiða eigur at fáast á, hvar peningurin skal fara, tá ein stovnur selur, slík tól, tá ið royndir eru lidnar.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at hesin peningur eigur at fara aftur til stovnin, ið selur og verða nýttur til áleið sama endumál, sum tær seldu maskinurnar vóru ætlaðar ella nýttar til.

Viðvíkjandi Vaktar- og Bjargingartænastuni halda løgtingsgrannskoðararnir, at tað hevði verið rímiligt, um Tryggingarsambandið bar størri útreiðslur til hjálparveitingar í nánd av Føroyum, enn teir í dag gera.

Viðvíkjandi játtanini til sjómansheim hava í fleiri ár staðið játtanir á figgjarlógini til sjómansheim í Reykjavík og í Vestmanna.

Her er talan um studning til byggingar, ið kunnu vera stórar og dýrar.

Árligu játtanirnar eru smáar, og ofta er torført at fáa hesar byggingar í gongd og gera tær lidnar.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tá ið stuðul verður givin til slíkar byggingar, so átti at verið umhugsað, umframt at givið studning, at gjørt eina veiðhaldsskipan, soleiðis at byggingar kundu verið gjørdar lidnar og bygdar skjótt.

Eitt annað er endamálið við hesum byggingum.

Tíðin tykist at vera farin frá sjómansheimum í vanligari merking. Hugsanin um sjómansheim í Vestmanna er gomul. Sama er at siga um sjómansheim í Reykjavík. Kortini halda løgtingsgrannskoðararnir, at endamálið við byggingum bæði í Vestmanna og í Reykjavík eigur at verða likið upp til endurskoðan. Hugsað eigur at verða um, at her verða bygd gistingarbús, ið hava møguleikar fyri at hýsa fyritakssemi, sum t.d. frítíðarítrivum, fundum og tílíkum.

Samráðingar eiga tí at vera tiknar upp við stýrini um at orða eina breiða endamálsgrein fyri nýtslu.

Viðvíkjandi ferðaútreiðslum á landskassarokningini er hetta ein av teimum konti, ið afturvendandi hevur yvirtrekk. Skipanin, sum hon nú er, er soleiðis, at flest allir stovnar hava sínar ferðaútreiðslur bókaðar beinleiðis hjá landskassanum og fáa loyvi frá landsstýrinum at fara at ferðast.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at henda skipanin eigur at verða endurskoðað, og at hvør stovnur átti at budgettera sínar ferðaútreiðslur eitt úr í senn og hildið seg innan fyri hesa ætlan.

Tann háttur, ið nú verður nýttur, er alt ov tilvildarligur og halda grannskoðararnir, at ein umlegging av hesum eigur at fara fram sum skjótast og seta fram uppskot til samtyktar samsvarandi hesum.

Annars gera løgtingsgrannskoðararnir vart við, at í hesum tíðarskeiði eru stór yvirtrekk framd viðvíkjandi um- og nýbygging á ymiskum økjum, og verður hetta harðliga átalað.

Løgtingsgrannskoðararnir halda eisini, at løgting og landsstýri eiga at hugsa um eina umskipan av allari landsumsitingini. Miðað eigur at vera ímóti eini skipan, ið gevur landsstýrismonnunum møguleika fyri at arbeiða meiri langsiktað, enn teir hava umstøður til nú.

Sum ein liður í hesum eigur løgtingsskrivstovan at fara til verka sum skjótast, soleiðis at tær uppgávur, ið hoyra løgtinginum til, kunnu umsitast fyri seg sjálvan.

1. viðgerð 6. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. apríl 1987. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

6. Grannskoðan av almennum roknskapum.
17. Tjaldurs Apotekið.

Ár 1987, mánadagin 6. apríl legði grannskoðaranevndin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Tjaldurs Apoteki fyri fíggjarárini 1983/84, 1984/85 og frá 1/4-31/12 1985.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Tjaldurs Apotekinum fyri omanfyrinevndu tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá apotekinum eru kannað, og at fíggjarliga støða apoteksins er í lagi.

Avlopið av apotekinum í omanfyrinevndu tíðarskeiðum, áðrenn avskrivingar, eru ávíkavist kr. 862.053,00, kr. 1.031.121,00 og kr. 729.825,00.

Avskrivingar í somu tíðarskeiðum hava verið ávíkavist: kr. 524.800,00, kr. 574.100,00 og kr. 610.619,00.

Apotekið tekur sær av sølu, partvís av heilivági og partvís av øðrum vørum, sokallað handkeyp.

Viðvíkjandi prísáseting av heilivági, eru prísirnir í Føroyum tengdir neyvt saman við prísirnar á danska marknaðinum. Í løtuni eru hesir 0,975 ferðir teir donsku prísirnar.

So statt finst eingin føroyskur politikkur viðvíkjandi prísi á heilivági. Hetta undrar løgtingsgrannskoðararnar, og halda teir hetta vera átaluvert.

Danski staturin hevur havt avgerðarrætt í, hvussu stórt tilskotið til tey ávisu heilivágssløgini hava verið. Hetta verður broytt, nú blokkstuðulsskipanin fer at virka. Nú verða møguleikar fyri, at føroyingar sjálvir kunnu leggja sína egnu tilskotsskipan og avgera, hvørji sløg av heilivági skulu hava tilskot og hvussu nógv.

Tað finst avsláttarskipan fyri heilivág til sjúkrakassar og ávísar læknar. Hon hevur verið í langa tíð, so hon eigur helst at verða endurskoðað.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at innkeypið til apotekini eigur at verða samskipað. Í dag keypa tey 3 apotekini inn hvør sær, og hetta gevur eina óneyðuga kapitalbinding og helst eisini eitt órationelt innkeyp.

Eisini halda løgtingsgrannskoðararnir, at hugt eigur at verða eftir talinum á ymsum sløgum av heilivági, ið kemur til landið. Hetta skal skiljast soleiðis, at tað eru nógv sløg av sama heilivági í ójøvnum prísklassa.

Ein avmarking kann koma brúkara og apotekunum til góðar.

Eini 8-10 fólk arbeiða á føroysku apotekunum við at framleiða heilivág.

Hendan framleiðsla eigur at verða stimbrað soleiðis, at framleiðslan av heilivági í Føroyum kann økjast. Framleiðslan er vorðin truplari, síðan Danmark fór inn í EEC. Tað hevur viðført eina meira miðsavnaða framleiðslu av heilivági í Danmark.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at ein bólkur ella ein nevnd eigur at verða sett, ið hevur umboð frá apoteksverkinum og læknastættini, sum í hvørjum einstøkum føri kundi tikið støðu til, hvørja framleiðslu vit skulu hava í landinum, og hvussu vit fáa atgongd til vitan um hesa framleiðslu.

Apotekið hevur í 1985 fingið nýggja EDV-skipan, og gevur hetta góðar møguleikar fyri at skráseta heilivágsnýtsluna.

Viðvíkjandi lógargrundarlagnum undir apoteksverkinum so er hetta umleið 40 ára gamalt. Landsumsitingin hevur í langa tíð arbeitt við nýggjum uppskoti til apotekaralóg.

Henda lóg er liðugtgjørd nú og vóna løgtingsgrannskoðararnir, at hon kemur fyri í tinginum, áðrenn tingið endar vetrartingsetuna.

2. viðgerð 8. apríl. Uppskotið samtykt við 27-0 atkvøðum.

7. Løgtingslóg um eydnuspæl v.m.

Ár 1986, týsdagin 16. september legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um eydnuspæl v.m.

§ 1. Løgtingslógin fevnir um eydnuspøl, har luttakararnir móti gjaldi vinna vinningar eftir eini skipan, sum er heilt ella partvís tilvildarlig.

§ 2. Við teimum undantøkum, sum fylgja av § 4, er bert loyvt at skipa fyri eydnuspæli, tá loyvi til tess er fingið frá landsstýrinum. Serligt loyvi krevst til sølu av útlendskum lutaseðlum.

2. stk. Ikki er loyvt vinnurøkjandi at útflýggja vinningar eftir eini skipan, sum er heilt ella partvís tilvildarlig.

§ 3. Loyvi kann bert verða givið til frama fyri almannagagnligt ella góðgerandi endamál.

2. stk. Loyvi kann ikki verða givið til eydnuspæl til frama fyri politisk endamál.

3. stk. Loyvi kann bert verða givið feløgum og líknandi, og bert sum samansetingin og virksemið hjá hesum skapar trygd fyri, at yvirskotið frá eydnuspælinum verður brúkt til ásetta endamálið.

4. stk. Um ikki landsstýrið, tá serligar umstøður gera seg galdandi, tekur aðra avgerð, skal loyvi umframt tær treytir sum, landsstýri sjálvt ásetir, verða treytað av, at:

lagtingslov om lotterispil m.v.

§ 1. Lagtingsloven omfatter lotterispil, hvor deltagerne mod betaling vinder gevinster efter et system, som er helt eller delvist tilfældigt.

§ 2. Med de undtagelser, som følger af § 4, er det kun tilladt at arrangere lotterispil, når tilladelse til dette er fået fra landsstyret. Særlig tilladelse kræves til salg af udenlandske lodsedler.

Stk. 2. Det er ikke tilladt for erhvervsdrivende at uddele gevinster efter et system, som er helt eller delvist tilfældigt.

§ 3. Tilladelse kan kun gives til fordel for almennyttigt eller veldedigt formål.

Stk. 2. Der kan ikke meddeles bortlodningstilladelse til fordel for politiske formål

Stk. 3. Tilladelse kan kun gives til foreninger og lignende, og kun hvis disses sammensætning og virksomhed skaber betryggelse for, at overskuddet for lotterispillet bliver anvendt til det fastsatte formål.

Stk. 4. Hvis ikke landsstyret, når særlige omstændigheder gør sig gældende, træffer anden afgørelse, skal til-

1. Vinningarnir í virði eru í minsta lagi 25% av samlaðu lutasøluni.
2. Eingin vinningur er kontantur peningur,
3. Persónar undir 15 ár ikki selja lutaseðlar,
4. Lutaseðlarnir verða seldir til tann tilskilaða prísin,
5. Prísurin á lutaseðlinum og dráttardagur verða prentað á lutaseðlarnar,
6. Dráttardagurin verður ikki fluttur,
7. Lutasøla sunnu- og halidagar ikki byrjar fyrr enn kl. 16.00,
8. Lutaseðlarnir verða ikki skiftir um við pening,
9. Lutasølan ikki fer fram meira enn 8 vikur frá tí at loyvið varð givið.
10. Seljarin ongan persónligan vinning fær.

§ 4. Feløg og líknandi, sum eru skattafræls eftir § 3 stk. 3 í Løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, kunnu uttan loyvi skipa fyri eydnuspæli eina ferð um árið, tá

1. loyvi til hetta kann gevast eftir § 3,
2. fráboðan um nær og hvar eydnuspælið fer fram er send landsstýrinum,
3. samlaða lutasølan í virði ikki fer uppum eina av landsstýrinum ásetta upphædd,

2. stk. Treytirnar í § 3 stk. 3, 1-9 eru eisini galdandi fyri hesar fyriskipanir. Landsstýrið kann til eina og hvørja

ladelsen, foruden de vilkår som landsstyret selv fastsætter, være betinget af, at:

1. Værdien af gevinsterne er mindst 25% af det samlede lodseddelsalg,
2. Ingen gevinst er et kontant pengebeløb,
3. Personer under 15 år ikke sælger lodsedler,
4. Lodsedlerne bliver solgt til den pålydende pris,
5. Prisen for lodseddelen og trækningsdato bliver påtrykt lodseddelen,
6. Trækningsdato ikke bliver flyttet,
7. Lodseddelsalg søn- og helligdage ikke begynder før klokken 16.00.
8. Lodsedlerne ikke bliver ombyttet med penge.
9. Lodseddelsalget ikke foregår mere end 8 uger fra tilladelsen blev givet.
10. Sælgeren ingen personlig gevinst får.

§ 4. Foreninger og lignende, som er fritaget for beskatning efter § 3 stk. 3 i Lagtingslov om landsskat og kommuneskat, kan uden tilladelse arrangere lotterispil engang om året, når

1. tilladelse til dette kan gives efter § 3,
2. anmeldelse om hvornår og hvor lotterispillet foregår er sendt til landsstyret,
3. det samlede lodseddelsalg i værdi ikke overstiger et af landsstyret fastsat beløb,

Stk. 2. Betingelserne i § 3 stk. 3, 1-9 gælder også for disse arrangementer. Landsstyret kan til enhver en tid påby-

tíð geva boð um at stedgast skal við søluni, ella áseta fleiri treytir.

3. Stk. Verður til eydnuspælið brúkt eydnuhjól, tombola ella onnur skipan, sum er ætlað fleiri eftir hvørjum øðrum fylgjandi dráttum, krevst altíð loyvi frá landsstýrinum.

§ 5. Uttan nakra avmarking av hesi lóg, kunnu feløg og líknandi skipa fyri eydnuspælj fyri limir og avvarðandi teirra, har almenningurin ikki hevur atgongd. Tó má

1. áðrenn farið verður undir eydnuspælið, fráboðan verða send landsstýrinum um, nær og hvar eydnuspælið fer fram,
2. virðið av vinningunum ikki fara uppum eina av landsstýrinum ásetta upphædd,
3. eingin vinningur vera kontantur peningur,
4. endamál felagsins ikki vera at skipa fyri eydnuspæli.

2. stk. Landsstýrið kann til eina og hvørja tíð gevboð um at gevast skal við tílíkum eydnuspæli.

§ 6. Innan 2 mánaðir eftir dráttin fávíkavist fyrsta dráttin, tá talan er um tombola, eydnuhjól og líknandi, skal roknskapur yvir allar inntøkur og útreiðslur eydnuspælinum viðvíkjandi sendast landsstýrinum. Við hesum skal fylgja:

1. Grannskoðan av ríkisgóðkendum grannskoðara. Hetta er tó bert neyðugt, um samlaða lutasølan í virði fer upp um eina av landsstýrinum ásetta upphædd,
2. kvittanir frá teimum, sum hava fingið pening útgoldnan.

de, at salget skal indstilles, eller fastsætte andre betingelser

Stk. 3. Bliver der til lotterispillet brugt lykkehjul, tombola eller andet system, som er beregnet til flere efter hinanden følgende trækninger, skal landsstyrets tilladelse altid indhentes.

§ 5. Uden nogen begrænsning af denne lov, kan foreninger og lignende arrangere lotterispil for foreningens medlemmer og disses pårørende, hvor offentligheden ikke har adgang. Dog må

1. før lotterispillet påbegyndes sendes landsstyret anmeldelse om hvornår og hvor lotterispillet finder sted,
2. værdien af gevinsterne ikke overstige et af landsstyret fastsat værdi,
3. ingen gevinst må være et kontant pengebeløb,
4. foreningen ikke alene have til formål at arrangere lotterispil.

Stk. 2. Landsstyret kan til enhver tid bestemme, at sädanne lotterispil skal ophøre.

§ 6. Inden 2 maneder efter trækningen (henholdsvis første trækning når der er tale om tombola, lykkehjul og lignende), skal regnskab over alle indtægter og udgifter ved lotterispillet sendes landsstyret. Med dette skal følge:

1. Revision af statsautoriseret revisor. Dette er dog kun nødvendigt, når værdien af det samlede lodseddelsalg overstiger et af landsstyret fastsat beløb.
2. Kvitteringer fra dem som har fået penge udbetalt.

3. Váttan frá avvarðandi prentsmiðju um talið av prentaðu lutaseðlunum, og prisin á teimum.
4. Váttan frá avvarðandi vinnarum um at hava fingið vinningin útflýggjaðan. Hetta er tó bert neyðugt um vinningurin í virði fer upp um eina av landsstýrinum ásetta upphædd.

2. stk. Harumframt skal váttan, fyri at yvirskotið frá eydnuspælinum er brúkt til ávíkavist loyvda endamálið smb. § 3, ella almannagagnligt ella góðgerandi endamálið smb. § 4, verða send landsstýrinum.

§ 7. Landsstýrið kann leggja sín avgerðarrætt og fráboðannarskylduna eftir hesi lóg til annan stovn.

2. stk. Reglur um klagu yvir avgerðir tiknar av hesum stovni við heimild í hesi lóg, herundir reglur um klagufreist, kunnu setast av landsstýrinum.

§ 8. Uttan so er, at strangari revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við bót revsaður hann, ið ikki

1. heldur § 2, § 4, 2. stk, § 5, § 6,
2. ger eftir boðum, sum hava heimild í § 4, stk. 1 og § 5, 2. stk.
3. heldur treytirnar í loyvinum.

2. stk. Í forskriftum, sum eru gjørdar við heimild í hesi lóg, kunnu gera reglur um revsing við bót fyri brot á hesar forskriftir.

3. stk. Fyri brot á hesa lóg ið verða gjørd av partafeløgum, lutafeløgum og líknandi, kann bótaábyrgd verða áløgd felagnum sum slíkum.

§ 9. Løgtingslógin kemur í gildi 1. juli 1987.

3. Erklæring fra vedkommende trykkeri om antallet af trykte lodsedler, og den påtrykte pris.
4. Erklæring fra vedkommende vindere om at have fået gevinsten udleveret. Dette er dog kun nødvendigt, når værdien af gevinsten overstiger et af landsstyret fastsat beløb.

Stk. 2. Desuden skal dokumentation for at overskuddet fra lotterispillet er anvendt til henholdsvis det tilladte formål jvf. § 3, eller almennyttigt eller velgørligt formål jvf. § 4, sendes landsstyret.

§ 7. Landsstyret kan henlægge sine beføjelser og anmeldelsespligt efter denne lov til anden myndighed.

Stk. 2. Regler om klage over afgørelser taget af denne myndighed med hjemmel i denne lov, herunder regler om klagefrist, kan fastsættes af landsstyret.

§ 8. Medmindre strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der ikke

1. overholder § 2, § 4, stk. 2, § 5, § 6.
2. efterkommer påbud, som har hjemmel i § 4 stk. 1 og § 5, stk. 2,
3. overholder vilkårene i tilladelsen

Stk. 2. I forskrifter, som udstedes i medfør af denne lov, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelser af disse forskrifter.

Stk. 3. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet, som sådant bødeansvar.

§ 9 Lagtingsloven træder i kraft den 1. juli 1987.

2. stk. Samstundis við hetta verður lógin »Klasselotteriet og forbud mod andet lottospil« frá 6.3. 1869 sett úr gildi.

Stk. 2. Samtidig med dette hliver loven »Klasselotteriet og forbud mod andet lottospil« frá 6.3. 1869 ophævet.

Viðmerkingar

Mál um burturlutanir eru — sambært lista A nr. 14 í heimastýrislógini — við á listanum yvir føroysk sermál, soleiðis at umsitingin av hesum málum er hjá landsstýrinum. Løgtingið hevur onga lóg gjørt um hetta evni, so galdandi lóggáva um burturlutan er sambært § 13 í heimastýrislógini framvegis danska lógin »Klasselotteriet og forbud mod andet lottospil« frá 1869, saman við ymsum rundskrivum, sum danska løgmálaráðið hevur givið út við heimild í hesi lóg.

A. Mannagongd landsstýrisins hevur tó ikki altíð samsvarað við hesi rundskriv, og tað er tí ivasamt, hvørjar galdandi reglur eru. Uppskotið er sett fram fyri at bøta um hetta.

B. Harumframt hevur tað vist seg, at mannagongd landsstýrisins hevur verið ógvuliga lagalig, soleiðis at bert umsóknir, har endamálið við burturlutanini als ikki kann sigast at vera »almennyttigt og velgørende«, verða sýttar (umleið 1,8% av øllum umsóknum). Tað er tí natúrligt og minkar um arbeiðið bæði hjá landsstýrinum og hjá umsøkjarunum, um galdandi skipan verður broytt soleiðis, at loyvi ikki krevst til at skipa fyri burturlutan, samstundis við at eftirlitið verður gjørt samsvarandi strangari. Broytingin í uppskotinum er tó ikki heilt so víttgangandi, m.a. tí at

1. Hetta bert er galdandi, um lutasølan í virði er minni enn eina av landsstýrinum ásetta upphædd
2. og bert fyri 1 burturlutan um árið
3. Landsstýrið til eina og hvørja tíð kann geva boð um, at steðgast skal við sølu ni ella áseta flairi treytir.

Harafturímóti er eftirlitið vorðið samsvarandi strangari, sí § 6. Her er broytingin — at grannskoðan av statsautoriseraðum grannskoðara skal sendast við roknskapinum, tá samlaða lutasølan í virði fer upp um eina av landsstýrinum ásetta upphædd — samstundis við til at lætta munandi um arbeiðið hjá landsstýrinum.

C. Hjáløgt uppskotinum er kanning um galdandi lóggávu, mannagongd landsstýrisins og galdandi lóggáva uttan fyri Føroyar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1:

Lógin umfatar ikki bert vanligt eydnuspæl, har allir luttakarar í jøvnum føti, men eisini tílík, har drigið verður millum til dømis rættar loysnir uppá eina uppgávu.

Hinvegin eru bert umfatandi eydnuspæl, sum innihalda ein tátt av tilvild. Kappingar, har besta úrslit verður lønt, falla tí uttanfyri.

Til § 2.

1. stk. Tað er sostatt ikki nógmikið til sølu av útlendskum lutaseðlum, at loyvi er fingið til sølu av »lutaseðlunum«. Tað má vera tilskilað, at hetta eisini umfatar lutaseðlar av útlendskum uppruna.

2. stk. Hetta stykki svarar til § 8 stk. 1 í donsku »Lov nr. 297. af 14.6.1974 om markedsføring«, og er tonkt at skula tulkast eins og hetta. Hetta forboðið er meiri umfatandi enn tað í 1. stykki, tí hetta er eisini galdandi, sjálvt um einki gjald krevst fyri luttøkuna, sí eisini § 1.

Til § 3:

1. stk. Loyvi kann eftir hesum ikki gevast til fyriskipanir, har endamálið er til frama fyri einstakar persónar, politisk ella vinnulig áhugamál, ella áhugamál, sum hava lítla undirtøku millum manna.

3. stk. Til treyt nr.

2: Hendan treytin er orsakað av tí almennu regluni um at »hasardspæl« ikki er lovyt. Møguleiki er eisini at vinna kontantan pening í V4-spælinum ella Happadráttinum.

3: Hendan treytin er orsakað av tí almennu regluni um at ómyndig ikki kunnu ráða yvir egnum ognum. Tað er tí hildið óhóskandi, at hesi skulu hava ábyrgdina fyri innkomna peningin.

10: Av tí at endamálið við fyriskipanini skal vera almannagagnligt ella góðgerandi, er tað eisini hildið óhóskiligt, at seljarin kann fáa persónligan vinning. Hetta er nevniliga, tí tað er til frama fyri einstakan persón, samsvarandi viðmerkingarnar til § 3, stk. 1, ikki umfatað av heitinum.

Galdandi lóggáva um burturlutan

1. Lógin. Galdandi lóg um burturlutan er frá 6.3.1869 »Klasselotteriet og forbud mod andet lottospil«. Eftir § 2 í hesi lóg er øll burturlutan, herundir søla av útlendskum lutaseðlum forboðin. Tó kunnu undantaksloyvi gevast.

a) »i veldædige øiemed« men bert í avmarkaðum økjum.
b) til tombola, um serligar umstøður gera seg galdandi

Eftir lógini er tað høvuðsfyrisitingin (í Føroyum amtmaðurin) sum hevur myndugleikan at geva hesi undantaksloyvi. Men við heimastýrislógini er hetta mál vorðið føroyskt sermál (pkt. 14 í lista A), og myndugleikin er tí hjá landsstýrinum.

§ 3 í lógini forbjóðar sølu av »partalutaseðlum«, t.v.s. partar í rættindunum eftir lutaseðlunum.

§ 4 seti forboð fyri sølu av rættindum til luttøku í *einkultum* dráttum eftir útlendskum »præmieobligationer«.

§ 5 bannar kunngerð í bløðum av sølum og burturlutanum, sum eru bannað eftir § 2-4.

2. *Rundskriv.* Danska løgmálaráðið gav í 1944 út eitt rundskriv til allar amtmenn og politimeistarar um burturlutan. Formelt hevur landsstýrið ikki avtikið hetta rundskriv, men av tí at praksis hjá landsstýrinum ikki altíð samsvarar við hetta, má tað sigast at vera tigandi avtikið. Rundskrivið er tó ikki uttan týdning fyri praksis.

A. Her stendur millum annað:

a) loyvi kann bert gevast um ætlaða lutasølan í virði ikki fer upp um 5000 kr.

b) loyvi kann bert gevast felagum, og í mesta lagi eitt um árið.

c) endamálið við burturlutanini skal vera »velgørende og almennyttigt«, t.v.s.

1) Yvirskotið skal alt, sum tað er, nýtast til endamálið.
2) »almennyttig«, merkir, at endamálið ikki má vera til frama fyri einstakar persónar, politisk ella vinnulig áhugamál ella áhugamál, sum hava lítla undirtøku millum manna.
3) Yvirskotið má nýtast til at gjalda gamla skuld tsjálvt um skuldin skyldast »velgørende og almennyttigt formål«).

Um ítróttur eftir hesum skal koma inn undir heitið »velgørende formål« má tann menniskjansligi førimunurin vera avgerandi (t.v.s. kappríðing og tílíkt er ikki umfatað.)

d) vinningurin má ikki vera í minsta lagi 20% av ætlaðu lutnsøluni, og má ikki vera kontantur peningur (men t.d. eitt gávukort).

e) loyvi kann bert verða givið fyri 8 vikur ísenn. Er loyvið givið til burturlutan í samband við veitslu, framsýning ella basar, má lutasølan ikki halda fram aftaná.

f) aftaná at drátturin hevur verið er søla av lutaseðlum ikki loyvd.

g) søla má ikki fara fram sunnu- og halgidagar áðrenn klokkan 16.00, tó undantikin søla, sum hevur samband við veitslu, framsýning ella basar.

h) loyvi kann bert gevast fyri eitt avmarkað øki.

i) børn undir 13 ár mugu ikki selja seðlar. Um seðlarnir vera seldir við dyrnar má persónurin vera í minsta lagi 18 ár.

j) seljarin má ongan persónligan vinning fáa.

k) kunngerð um burturlutan í bløðunum (burtursað frá úrslitinum) er ikki

loyvd. Undantiknar eru tó kunngerðir um burturlutanir, sum hava samband við veitslu, framsýning ella basar.

B. Serliga um burturlutanir innanfyri feløg.

1) Um allir limir kunnu luttaka, bert tí teir eru limir, er loyvi ikki neyðugt.

2) Loyvi er heldur ikki neyðugt til *bingospæl*, tá

a) spælt verður til tess at undirhalda innan fyri felagskarmin.

b) innsatsur og vinningur eru kendir.

c) vinningurin er vøru, og hevur lítið virði.

d) einki yvirskot verður.

3) Loyvi *kann* verða givið, sjálvt um:

a) endamálið er undirhaldandi, um eitt møguligt yvirskot verður brúkt til veitsluhald fyri limirnar ella líknandi.

b) onnur enn limir kunnu luttaka, tó má í minsta lagi helvtin av luttakarunum vera limir.

Til hetta rundskriv frá 1944 varð rundskriv um burturlutan frá 15.7.47 lagt afturat. Hetta býtur sundur myndugleikan at geva undantaksloyvi, soleiðis at politimeistararnir kunnu geva loyvi til tombola og lutasølu, har samlaða lutasølan er undir 5000 kr., meðan amtmenninir kunnu geva loyvi til lutasølu uppá meira enn 5000 kr., men undir 15.000 kr. Til burturlutan kann bert løgmálaráðið geva loyvi. Aftan á heimastýrisskipanina hevur landsstýrið yvirtikið myndugleikan hjá løgmálaráðnum og amtmanninum.

3. Løgtingslógir: Løgtingið hevur givið út fleiri lógir um burturlutan, men hesar hava bert snúð seg um Happadráttin (L1.49 15.6.50 (smb. L1.10 17.3.81) og L1.2 13.2.78) og V4-dráttin (L1.71 20.11.69).

Mannagongd

Yvirlit yvir játtanir og noktanir í tíðarskeiðnum 1959-1986:

	noktanir	játtanir	alt
bygdafeløg	0	32	32
kristilig feløg innan fólkakirkjuna	0	46	46
kristilig feløg uttan fólkakirkjuna	0	93	93
skótar/ítróttarfeløg	3	253	256
ungmannafeløg	1	32	33
»heilsu«-feløg	3	34	37
privat	0	2	2
onnur	5	162	167
Alt	12	654	666

Talið av umsøkjarum var 308. Dømir uppá »heilsu«-feløg kunnu vera »Sclerosefelagið« og »Føroya felag móti krabbameini«. »Onnur« kunnu t.d. ver sjómannaheim og kvinnufeløg.

Sum hagtølini vísa, hevur mannagongdin verið ógvuliga lagalig, soleiðis at bert 1,8% av umsóknunum ikki eru gingnar á møti. Grundgevingin hevur tá í flestu førum verið, at endamálið ikki hevur verið til fruma fyri »velgørende og almennyttige formål« (t.d. umsóknin hjá »Fólkafylkingini móti EEC«, har endamálið var politiskt, og umsóknin hjá 3. real, har endamálið ikki hevði almennan áhuga (uttanlandsferð)).

Annars kann verða vist til treytirnar, sum landsstýrið í hvørjum einstøkum føri hevur sett, fyri at loyvi verður givið. Hesar hava í flestu førum verið eins (standardskriv), og ljóða nú soleiðis:

»Hervið verður sagt frá, at landsstýrið hevur samtykt
at játta umsóknini, treytað av,
at sølan av lutaseðlum bert fer fram í tíðini frá...(uml. 1 mánað),
at vinningarnir í virði eru minst 20% av prísinum á teimum prentaðu lutaseðlunum,
at lutaseðlarnir bert verða seldir til tann tilskilaða prísin,
at dráttardagurin verður prentaður á lutaseðlarnar,
at sølan sunnu- og halgidagar ikki byrjar fyrrenn kl. 16,
at tey, sum hava givið lutir, ikki fáa samsýning í lutaseðlum,
at lutaseðlarnir ikki verða skiftir um við pening, og
at roknskapur yvir allar inntøkur og útreiðslur burturlutingini viðvíkjandi verður sendur landsstýrinum innan... (1 máað aftaná loyvið er útgingið).

Við roknskapinum mugu sendast kvittanir frá teimum, sum hava fingið pening útgoldnan, og váttan frá avvarðandi prentsmiðju um talið á teimum prentaðu lutaseðlunum og prísin á teimum.

Eisini mugu teir óseldu seðlarnir sendast landsstýrinum. Um ikki treytirnar verða hildnar allar sum ein, dettur loyvið burtur beinanvegin.«

Síðani 1960 er bert treytin »*at* dráttardagurin verður prentaður á lutaseðlarnar« komin aftur*at*, meðan treytin »*at* persónar undir 18 ár ikki mugu selja lutaseðlar« er fallin burtur.

Sjálvt um hesar treytir minna nógv um rundskriv hjá løgmálaráðnum, kann hetta ikki sigast at vera galdandi longur. M.a. eru nógv dømi um, at umsóknin er játtað, sjálvt um ætlaða lutasølan var meira enn 5000 kr.

Men ikki bert hesar reglur kunnu grunda noktan. Til dømis varð loyvi ikki givið »Kræftens Bekæmpelse«, tí at »Føroya felag móti Krabbameini« í sama tíðarskeiði skipaði fyri lutasølu.

Galdandi lutaseðlalóggáva uttan fyri Føroyar.

A. Danmark: Galdandi lóg í Danmark er enn »klasselotteriet og forbud mod andet lottospil« frá 1869. Løgmálaráðið hevur smb. § 2 í hesi lóg givið út fleiri

rundskriv, seinast tann 14.10.66. Hetta rundskriv hevur í høvuðsheitum sama innihald sum áðurnevnda rundskriv frá 14.2.44, men er sett nakað øðrvísi upp.

Størsta nýskapanin er helst, at eftirlitið við burturlutanini er vorðið nógv strangari. T.d. skal

a. roknskapur yvir útreiðslur og inntøkur burturlutanini viðvíkjandi, har samlaða lutasølan fer uppum 50.000 kr., verða góðkend av einum grann skoðara.

b. innkomin peningur, sum hevur eitt virðið uppá meira enn 2000 kr. verða settur inn á bankabók, sum bert kann ráðast yvir við undirskrift av í minsta lagi tveimum persónum í felag.

Harumframt setir Markedsføringslov frá 14.6.74 í § 8 forboð fyri at *vinnurøkjandi* skipa fyri burturlutanum.

B. Island: Galdandi lógir í Íslandi um burturlutan eru a) »Løg um happdrætti og hlutaveltur« frá 15.6.26 og B) »Løg um happdrætti Háskúla Íslands« frá 1.4.73.

a. eftir § 1 er øll burturlutan forboðin uttan loyvi frá løgmálaráðharranum. Um vinningurin er í reiðum peningi krevst lógarheimild.

Eftir § 2 er tað heimilað løgmálaráðharranum at veita Háskúla Íslands loyvi til burturlutan. Eftir § 2 skilst tó, at hetta loyvi bert umfatar burturlutanir, har vinningurin er ein peningaupphædd, sí eisini § 1 undir a. Løgmálaráðharrin kann eisini geva undantaksloyvi til onnur, um

1. endamálið er góðgerandi
2. endamálið er nágreiniliga ásett
3. lutasølan fer fram í einum avmarkaðum tíðarbili, í mesta lagi 1 ár.

C. Noreg: Galdandi lóg í Noreg er »Lov om lotterier m.v.« frá 12.5.1939. Eftir § 2 í hesi lóg er øll burturlutan bannað utlan loyvi frá løgregluni, sum smb. § 4 kann geva loyvi til »samfunnsnyttig og veldedig formål«. Um løgreglan ikki, tá serligar umstøður gera vart við seg, tekur aðra avgerð, skal loyvið vera treytað av millum øðrum:

at virðið á vinningunum er í minsta lagi 25% av loyvdu lutasøluni.

at vinningarnir eru tryggjaðir

at roknskapur, prógv fyri at vinningarnir eru latnir vinnarunum og at yvirskotið er brúkt til ásetta endamálið, verður sent løgregluni.

Loyvi krevst tó smb. § 5 ikki, tá felag o.l. skipa fyri burturlutan til frama fyri »samfunnsnyttig og veldedig formál« og virðið á vinningunum ikki fer uppum eitt av »justitsdepartementet« ásett tal.

Eftir § 7 er tað ikki loyvt at vinningurin er ein peningaupphædd ella tílíkt.

Eftir § 8 er søla av útlendskum lutaseðlum hannað, men Kongur kann undir serligum umstøðum geva undantaksloyvi til hetta.

D. Svørki: Svenska lógin »Lotterilag« frá 10.11.1982 skilir ímillum burturlutanir, har vinningurin er ávíkavist a) ein peningaupphædd og b) ein vøra:

a) loyvi krevst, um burturlutanin verður fyriskipað fyri almenningin. Loyvi kann hert gevast, um burturlutanin »kommer at bedrivas på ett från allmän synspunkt lämpligt sätt«.

b) Loyvi kann hert *gevast felagum*, sum virka fyri einum »almennyttig ändemåle«. Tá loyvi verður givið skal samb. § 12 serliga hugsast um tørvin hjá felagnum eftir inntøkum, um marknaðurin kann rúma fleiri burturlutingum og um burturlutingin kann hugsast at geva felagnum eitt rímuligt yvirskot.

Eftir § 14:

1. má virðið á hvørjum lutaseðli ikki fara uppum 10 kr.
2. størsti vinningurin ikki fara uppum 500 kr.
3. samlaða lutasølan ikki fara uppum 30.000 kr.
4. og virðið á vinninginum má í mesta lagi vera 50% av samlaðu lutasøluni.

Tó er ikki neyðugt við loyvi, tá millum annað:

1. burturlutingin verður fyriskipað í samband við eina almenna stuttleikafyriskipan
2. virðið á hvørjum lutaseðli er í minsta lagi 2 kr.
3. vinningarnir ikki hava eitt virðið uppá meira enn 100 kr. hvør
4. at vinningurin verður útflýggjaður beint aftan á luttøkuna.

Eftir § 18 er loyvi heldur ikki neyðugt, tá burturlutingin hevur samband við tíðarrit ella útvarpssending. Tó má luttøka í burturlutingini ikki vera treytað av, at blaðið er keypt, ella at nakað gjald er latið. Størsti vinningurin má ikki fara upp um 500 kr.

1. viðgerð 16. september. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 20. februar legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði uppskotið fyri tingið hin 16. september 1986, og við 1. viðgerð hin 23. september varð málið beint í rættarnevndina.

Í viðmerkingum landsstýrisins verður gjølliga greitt frá galdandi skipan, sum er ring at halda, og teimum broytingum, sum liggja í uppskotinum í mun til galdandi reglur. Sambært mál nr. 14 á lista A í heimastýrislógini er burturlutanir føroysk sermál. Eftir hesum skuldi lóggávuvaldið í hesum máli verið hjá løgtinginum og fyrisitingin hjá landsstýrinum. Men við tað, at løgtingið ongantíð hevur gjørt reglur fyri hetta økið, so hava alsamt, sambært grein 13 í heimastýrislógini, danskar rættarreglur verið galdandi.

Hesar rættarreglur eru fyrst og fremst danska lógin um eydnuspæl frá 1869 og sum ískoyti og nærri útgreiningar av henni rundskriv løgmálaráðsins frá 1944 og 1947. Løgtingslógir hava hert verið samtyktar viðvíkjandi happadrátti og V-4 spæli.

Aftan fyri ynski landsstýrisins um broytingar og ábøtur liggur tann veruleiki, at munnagongdin higartil ikki altíð hevur samsvarað við nevndu rundskriv, tí at ivasamt hevur verið, hvørjar reglur, ið hava verið galdandi. Av hesum sigst munnagongdin hava verið »ógvuliga lagaliga«.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd við landsstýrinum í, at neyðugt er at gera greiðari og meira samskipaðar reglur um eydnuspæl v.m. Uppskotið verður tí eisini at skilja sum eitt slag av upprudding á einum øki við ógreiðari lóggávu, sum tískil hevur verið ring at umsita konsekvent. Uppskotið er hartil fyrsta roynd hjá heimastýrinum at gera løgtingslóg fyri eitt málsøki, sum sambært lista A nr. 14 í heimastýrislógini er føroyskt sermál og tí eigur at hava eitt lógargrundarlag.

Rættarnevndin mælir tí løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mars, § 1 samtykt við 29-0, §§ 2-8 samtyktar við 28-0, § 9 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. mars. Lógin endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

FL. j. nr. 632-1. Lóg nr. 53 frá 7. mai 1987.

8. Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur

Ár 1986, 16. september legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur:

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur við seinni broytingum, verður henda broyting gjørd:

§ 6 verður soljóðandi:

»Grunnurin kann upptaka lán við landskassaveðhaldi, tó hægst 10 mill. kr. árliga«.

§ 2.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder.

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 av 26. juni 1973 om udviklingsfond for industri, håndværk og serviceforetagender med senere ændringer foretages denne ændring:

§ 6 affattes således:

»Fonden kan optage lån med landskassegaranti, dog højst 10 mio. kr. årlig«

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dgen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur samtykt at skjóta upp fyri tinginum, at logtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um Menningargrunn idnaðarins verður broytt soleiðis, at grunnurin kann taka lán við landskassaveðhaldi, tó hevgst 10 mió. kr. árliga.

Øll árini, síðani grunnurin fór at virka, hevur hann havt heimild til lántøku við landskassaveðhaldi. Higartil hevur heimildin verið galdandi fyri eitt avmarkað áramál. Seinast var hon galdandi í fimm ár. Tann heimildin gekk út í 1985.

Umroddu fimm árini var heimildin 5 mió. kr. um árið. Nú biður grunnurin um 10 mió. kr. um árið og eisini verður bidið um, at eink fast áramál verður sett í lógina.

Tann peningur, sum higartil er lentur eftir hesi heimild, er altið lentur í Føroyum, og tað er eisini ætlanin framyvir. Lánini verða tikin úr ávíkavist Íløgugrunninum á Gjaldstovuni og Íleggingargrunninum fyri Føroyar.

Útlánsvirksemið hjá Menningargrunninum er støðugt vaksandi. Tá talan er um nýggj idnaðarvirkir, er tørvurin á rakstrarlánum stórur. Íløgutørvurin er eisini nógv vaksin. Hetta kemst av, at sonevndi kjallaraídnaðurin er vorðin til størri ídnaðarvirkir, sum krevja nógv størri íløgur. Eisini hevur grunnurin lent til alivinnu tey seinastu árini.

Eginpeningur grunsins er 56 mió. kr., meðan tántøka grunsins er 129 mió. kr. Grunnurin hevði eitt rakstraravlop í 1984/85 uppá 3,3 mió. kr. Nevnast kann, at rakstraravlopið í 1982/83 var 6 mió. kr. Við teimum rentuútreiðslum grunnurin hevur, er eink at ivast í, at grunnurin um fá ár kemur at hava negativt rakstraravlop, um ikki grunnurin hereftir fær ódýrari lán ella hægri útlánsrentu ella eisini størri játtan yvir figgjarlógina.

Ein kann undrast yvir, at gjaldførið grunsins ultimo 1985, bert liggur um 12 mió. kr. Hetta kemst av, at nevod grunsins hevur roynt at leggja so stóra upphædd av til útlánsvirksemi grunsins sum gjørligt, uttan tó at koma gjaldføri grunsins í vanda. Grunnurin veðheldur fyri 36 mió. kr., einahelst til fiskaaling. Orsakað av hesum veðhaldsskyldum má grunnurin hava somikið gott gjaldføri, at rindast kunnu o.u. 30% av veðhaldsskyldunum, um hesar gerast »effektivar«.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð uttan orðaskifti beint í ídnaðarnevndina, sum 29. januar 1987 legði fram soljóðandi

Álit

Uppskotið varð framlagt av landsstýrinum tann 17. september 1986 og eftir 1. viðgerð 1. oktober 1986 beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og leikur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 4. februar 1987. § 1 varð samtykt við 24-0, § 2 24-0. Við 24-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. februar. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F. L. j.nr. 1212-14-1 Lóg nr. 93 frá 19. nov. 1987.

9. Skrásetingargjald á akførum

Ár 1986, mikudagin 17. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til

løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

§ 1.

Fyri motorakfør v.m., ið innflutt verða, og sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skráseting-argjald, sum byggir á gjald av virði og gjald av vekt akfarsins.

2. stk. Gjaldið verður at rinda í landskassan samstundis sum akfarið verður skrásett.

§ 2

Virðisgrundarlagið er søluprísurin frá seljara í Føroyum til keypara, tá akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og eykaútgerð og ikki er íroknað skrásetingargjald sbr. § 1, skrásetingarsýn, trygging, vegskatt o.t. í Føroyum.

2. stk. Vektgjuldsgrundarlagið er typugóðkenda totalvektin uv akfarinum.

lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1

For importerede motorkøretøjer m.v., der er registreringspligtige efter færdselsloven, fastsættes en indregistreringsafgift, der bygger på en værdi- og en vægtafgift.

Stk. 2. Afgiften betales til landskassen samtidig med at køretøjet indregistreres.

§ 2.

Værdigrundlaget er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, når køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstra udstyr, men ikke medregnet indregistreringsafgift, jfr. § 1, registreringsgebyr, forsikring, vejskatter o.l. på Færøerne.

Stk. 2. Vægtgrundlaget er den typegodkendte totalvægt af køretøjet.

§ 3.

Persónvognar.
Virðisgjald.

Undir/under kr. 20.000: 10%
kr. 20.001 kr. 40.000: kr. 2.000 av 20.000 og 30% av restini/af resten
kr. 40.001 - kr. 60.000: kr. 8.000 av 40.000 og 60% av restini/af resten
kr. 60.001 - kr. 80.000: kr. 20.000 av 60.000 og 70% av restini/af resten
kr. 80.001 - kr. 100.000: kr. 34.000 av 80.000 og 85% av restini/af resten
kr. 100.001 - kr. 120.000: kr. 51.000 av 100.000 og 100% av restini/af resten
kr. 120.001 og yvir/og derover: kr. 71.000 av 120.000 og 115% av restini/af resten

Vektgjald
kr. 21 pr. kg.

2. stk. Hýruvognar og skúlavognar.

Munurin millum skrásetingargjald av persónvogni og hýruvogni/skúlavogni verður endurrindaður úr landskassanum yvir eitt 2 ára skeið eina ferð árliga.

3. stk. Líkningarráð Føroya váttar, at akfarið er í nýtslu sum hýru/skúlavognur. Landsstýrið ásetir nærri reglur hesum viðvíkjandi.

4. stk. Verður hýruvognur/skúlavognur skrásettur til persónvogn áðrenn 3 ár (36 mðr.) verður gjaldið afturrindað landskassanum svarandi til tíðina sum írestar teimum 36 mánaðir.

5. stk. Virðisgjald undir kr. 100.000: 20% kr. 100.001 og yvir: kr. 20.000 av kr. 100.000 og 30% av restini.

Vektgjald **Einki gjald**

***6. stk.* Vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar.**

Verður vøruvognur umskrásettur til persónvogn skal munurin í vektgjaldi rindast til landskassan.

Virðisgjald
Sum persónvognar.

Vektgjald
50 % av gjaldinum fyri persónvognar

§ 3.

Personmotorkøretøjer.
Værdiafgift.

kr. 2.000 af 20.000 og 30% af restini/af resten
kr. 8.000 af 40.000 og 60% af restini/af resten
kr. 20.000 af 60.000 og 70% af restini/af resten
kr. 34.000 af 80.000 og 85% af restini/af resten
kr. 51.000 af 100.000 og 100% af restini/af resten
kr. 71.000 af 120.000 og 115% af restini/af resten

Vægtafgift
21 kr. pr. kg.

Stk. 2. Hyrevogne og skolevogne

Forskellen mellem indregistreringsafgiften for personvogn og hyre/skolevogn refunderes over en 2 årig periode een gang årlig.

Stk. 3. Færøernes Ligningsråd afgiver erklæring om, at køretøjet anvendes som hyre/skolevogn. Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser herom.

Stk. 4. Hvis en hyrevogn/skolevogn omregistreres til personvogn inden 3 år (36 måneder) tilbagebetales afgift til landskassen svarende til den resterende del af de 36 måneder.

Stk. 5. Værdiafgift under 100.000 kr: 20% 100.000 kr og derover: 20.000 kr. af 100.000 kr. og 30% af resten.

Vægtafgift **Ingen afgift**

***Stk. 6* Varevogne af type og fabrikat som personvogne.**

Hvis varevogn omregistreres til personvogn, skal forskellen i vægtafgift betales landskassen.

Værdiafgift
Som personvogne

Vægtafgift
50% af afgiften for personvogne.

7. stk. Bussar til 10-19 fólk, førarin íroknaður.

Virðisgjald
10-13 persónar 20%
14-16 persónar 10%
17-19 persónar 5%

Vektgjald
Einki gjald

8. stk. Bussar til 20 fólk ella fleiri, førarin íroknaður.

Virðisgjald
Einki gjald

Vekt gjald
Einki gjald.

9. stk. Last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar, stødd eftir totalvekt.

Virðisgjald
3.500 kg og undir 20%
yvir 3.500 kg 10%

10. stk. **Avlamisvognar**

Virðisgjald
15%

Vektgjald
Einki gjald

11. stk. Neyðsendarakfør og líkvognar.

Virðisgjald
Einki gjald.

Vektgjald
Einki gjald

Stk. 7. Busser til 10-19 personer, føreren iberegnet.

Værdiafgift
10-13 personer 20%
14 16 personer 10%
17-19 personer 5%

Værdiafgift.
Ingen afgift.

Stk. 8. Busser til 20 personer eller mere, føreren iberegnet.

Værdiafgift
Ingen afgift.

Vægtafgift
Ingen afgift.

Stk. 9. Last- og varevogne, dumpers og sættevogne, størrelse efter totalvægt.

Værdiafgift
3500 kg og derunder 20%
over 3500 kg 2 kr pr kg

Stk. 10. **Invalidevogne**

Værdiafgift
15%

Vægtafgift
Ingen afgift

Stk. 11. Udrykningskøretøjer og rustvogne.

Værdiafgift
Ingen afgift

Vægtafgift
Ingen afgift

12. stk. Motorsúklur

Virðisgjald
110 %

Vektgjald
Einki gjald

13. stk. Viðfestivognar 3.500 kg totalvekt og undir.

Virðisgjald
1.000 kg og undir: 30%
yvir 1.000 kg: 20%

Vektgjald
1.000 kg og undir: 10 kr. pr. kg
yvir 1.000 kg.: 4 kr.pr.kg.

§ 4 Brúkt motorakfør
Virðisgrundarlagið fyri brúkt motorakfør, sum verða innflutt, er virðið á nýggjum akfari frádrigið 2% pr. ár fyri aldur, tó ikki niður um 90%.

§ 5. Gjald fyri umskráseting við eigaraskifti.
Fyri umskráseting av akfari við eigaraskifti skulu rindast kr. 600 til landskassan.

§ 6.
Tollvaldið kann krevja alt skjala- og annað tilfar, ið seljarin av akføri nýtir til virðis- og vektgjaldsgrundarlagið, útflýggjað.

§ 7.
Seljarin hevur skyldu til at leggja fram fyri tollvaldinum teir til eina og hvørja tíð galdandi søluprísir.

2. stk. Seljarin hevur skyldu til at upp-

Stk. 12. Motorcykler

Værdiafgift
110 %

Vægtafgift
Ingen afgift

Stk. 13. Påhængsvogne 3.500 kg totalvægt og derunder.

Værdiafgift
1.000 kg og derunder: 30%
over 1.000 kg: 20%

Vægtafgift
1.000 kr. og derunder: 10 kr.pr.kg.
over 1.000 kg: 4 kr. pr. kg.

§ 4. Brugte motorkøretøjer
Værdigrundlaget for brugt motorkøretøj, der importeres, er værdien af nyt køretøj, reduceret med 2% pr år for alder dog ikke under 90%.

§ 5. Afgift for omregistrering ved ejerskifte.
For omregistering af køretøj ved ejerskifte betales kr. 600 til landskassen.

§ 6
Toldvæsenet kan forlange alt dokumentations- og andet materiale, der af sælgeren anvendes som grundlag for værdi- og vægtafgiften, udleveret.

§ 7
Sælgeren er forpligtet til at forelægge for toldvæsenet de til enhver tid gældende salgspriser.

Stk. 2. Sælgeren er forpligtet til at in-

lýsa fyri einum og hvørjum, hvør prísurin er uttan at skrásetingargjald er íroknað og hvussu mikið skrásetingargjaldið fyri seg er.

§ 8

Seljarin hevur skyldu at gera sáttmála fyri hvørt akfar, ið selt verður. Avrit av hesum sáttmála verður at lata tollvaldinum samstundis sum skrásetingargjaldið verður goldið.

§ 9

Frítikin fyri skrásetingargjald eru akfør, ið innflutt verða sum flytigóds, tá persónur tekur fastan bústað í Føroyum. Eigaramaðurin skal tá hava verið búsettur í hinum partinum av ríkinum ella í útlandinum í minsta lagi 1 ár, og skal akfarið hava verið endaliga skrásett í hansara navni í minsta lagi 6 mánaðir í tí landinum, hann kemur úr, áðrenn hann kemur higar til landið. Persónur ið flytur til landið kann bert hava eitt akfar við sær. Skiftir akfarið eigara ella nýtara áðrenn 1 ár eftir skráseting, kemur tað undir skrásetingargjald.

§ 10.

Landsstýrið verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur og fyriskipanir hesi lóg viðvíkjandi.

§ 11.

Hann, sum fyri tollvaldinum gevur frásøgn, sum samsvarar ikki viðkomandi farm ella viðkomandi vøru, slag, mongd ella virði, kemur undir bót, uttan so hann eftirfarandi prógvføri, at skeivleikin stendst av viðurskiftum, sum hvørki hann sjálvur ella hann,

§ 8

Sælgeren er forpligtet til at udfærdige kontrakt for hvert køretøj, der handles. Genpart af kontrakten skal overlades til toldvæsenet samtidig med betaling af indregistreringsafgiften.

§ 9.

Fritaget for indregistreringsafgift er køretøjer, der indføres som rejsegods, når en person tager fast bopæl på Færøerne. Ejeren skal da have været bosiddende i den anden del af riget eller i udlandet i mindst 1 år, og køretøjet skal have været endeligt indregistreret i vedkommendes navn i mindst 6 måneder i det land, hvorfra fraflytning sker, forinden indrejse her i landet. Person, der indrejser til landet, kan højst medtage 1 køretøj. Skifter køretøjet ejer eller bruger inden 1 år efter indregistrering, kommer de under indregistreringsafgift.

§ 10.

Landsstyret får bemyndigelse til med bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler og bestemmelser i forbindelse med denne lov.

§ 11.

Den, som over for toldvæsenet afgiver en angivelse, der ikke svarer til den pågældende ladnings eller de pågældende varers art, mængde eller værdi, straffes med bøde, medmindre han med sikkerhed godtgør, at urigtigheden skyldes omstændigheder, hvorpå såvel han

sum var hansara vegna, hevði havt nakað við at gjørt. Hann, sum givið hevur skeiva frásøgn við vilja til tess at sleppa undan tolli ella avgjaldi ella av órøttum at fáa undantaksloyvi ella endurgjald fyri avgjald ella av órættum at fáa fráskriving í upplag, ella sum átti at havt sæð, at frásøgnin var egnað at havt við sær tílíkar fylgjur, komur undir bót, hefting ella fongsul uppí 6 mánaðir. Undir somu sektina komur hann, sum afturat frásøgn leggur fram skjøl, sum eftir sínum innihaldi eru egnað at hava við sær fylgjur, sum frammanfyri tilskilað, tá hann sá ella átti at havt sæð, at viðkomandi skjøl vóru skeiv ella høvdu brek.

som den, der handler på hans vegne har været uden indflydelse. Den, der har afgivet den urigtige angivelse med forsæt til at unddrage told eller afgift, eller opnå uberettiget fritagelse for eller godtgørelse af told eller afgift, eller uberettiget fraskrivning i oplag, eller som burde have indset, at angivelsen var egnet til at medføre følger af denne art, straffes med bøde, hæfte eller med fængsel indtil 6 måneder. Tilsvarende straffebestemmelser finder anvendelse på den, der i forbindelse med angivelse fremlægger dokumenter, hvis indhold er egnet til at medføre følger, som foran nævnt, når han indså eller burde have indset, at de pågældende dokumenter var urigtige eller mangelfulde.

§ 12.

Brot ella brotsroynd móti hesi lóg ella reglum, sum givnar eru eftir henni, kemur undir bót, um so er, at í hesi lógini ella í lóggávuni annars er ikki fyrisett serstak sekt.

2. stk. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum í sjálvum sær.

§ 12.

Overtrædelse eller forsøg på overtrædelse af nærværende lov eller af de i medfør af loven givne forskrifter straffes med bøde, for så vidt der ikke i denne lov eller i lovgivning i øvrigt er fastsat særlig straf herom.

Stk. 2. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges som sådant.

§ 13.

Brot móti hesi lógini ella teim forskriftum, sum givnar eru eftir henni, kemur undir bót v.m. eftir avgerð frá tollvaldinum, uttan so tað ynskir sær avgerð hjá dómstólinum. Bøtur, sum tollvaldið leggur á, fara í landskassan.

2. stk. Avgerð hjá tollvaldinum kann av honum, sum komin er undir bót,

§ 13.

Overtrædelse af denne lov eller af de i medfør af denne lov givne forskrifter straffes med bøde m.v. i henhold til toldvæsenets afgørelse, medmindre dette måtte ønske sagen afgjort ved domstolene. Bøder, som toldvæsenet i kender, tilfalder landskassen.

Stk. 2. Den, hvem toldvæsenet har på-

krevjast skotin inn til avgerðar hjá dómstólinum, tá ið tað verður kravt skrivliga innan 14 dagar, frá tí avgerðin var gjørd.

3. stk. Tollvaldið stílar fyri, at málið kemur fyri dómsstólin. Tá ið mál um brot móti hesi lógini verður skotið inn til dómstólin, fer tað fram sum politimál.

4. stk. Bøtur eftir hesi lóg kunnu heintast við panting.

lagt bøde, kan inden 14 dage efter bødepålægget skriftligt begære sagen indbragt for retten.

Stk. 3 Sagens indbringelse for retten foranlediges af toldmyndighederne. Når sagen angående overtrædelse af denne lov indbringes for domstolene, behandles de som politisager.

Stk. 4. Bøder i henhold til denne lov kan inddrives ved udpantning.

§ 14.

Tey í kapitul 68, 69, 70 og 72 í rættargangslógini nevndu rættarmiðal koma eisini í nýtslu í málum sum hesum í sama mun sum í málum, sum eftir vanligum reglum tilkoma statsadvokatinum at røkja. Er spurningurin at dømast at sita, skal tað sigast honum, sum undir ákæru er, at hann hevur rætt at fáa uppnevnt verja. Persónar, sum hýraðir eru við skipi í uttanlandssigling, og persónar, sum eru ikki búgvandi í landinum, sleppa ikki undan at eftirkoma avgerð frá tollvaldinum til avgerð fyriliggur frá dómsstólinum, við at biðja um at fáa málið inn fyri rættin.

§ 14.

De i lov om rettens pleje kap. 68, kap. 69, kap. 70 og kap. 72 omhandlede retsmidler finder anvendelse på de pågældende sager i samme omfang som i sager, som det efter almindelige regler tilkommer statsadvokaten at forfølge. Er der spørgsmål om idømmelse af fængselsstraf, skal tiltalte gøres opmærksom på, at han har ret til at få beskikket en forsvarer. Personer, der er forhyret med skibe i udenrigsfart samt personer, der ikke er bosiddende her i landet, kan ikke ved at begære sagen indbragt for domstolene befri sig for forpligtelse til at efterkomme toldvæsenets afgørelse, indtil rettens afgørelse måtte foreligge.

§ 15.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 15.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið arbeiðir við at gera uppskot til nýggja og nútímans tolllóg. Sum ein liður í hesum arbeiði verður mælt til, at akfør verða tikin burtur úr tolllógini í tann mun, at punktgjøldini í staðin verða løgd um til eitt skrásetingargjald av motorakførum.

Bert súklur og prutl verða eftir í punktgjøldunum í tolllógini. Øll akfør, ið skulu skrásetast til at koyra á føroyskum vegum, koma undir skrásetingargjald, eisini viðfestisvognar.

Skrásetingargjaldið byggir á eitt vektgjald og eitt virðisgjald. Tá talan er um høgt skattaðar vørur er rímuligt, at ein partur av gjaldinum byggir á annað enn virðið, t.d. sum er á vektina. M.a. er tað ikki ynskiligt, at bilar verða skattligа revsaðir fyri, at tað er gjørt nakað fyri dygd og trygd. Hin vegin er ynskiligt at skatta kostnaðarmiklar hentleikar, sum ikki ávirka ferðslutrygdina.

Virðisgjaldið verður her lagt á søluprís frá seljara. Hetta er best definerada virðið, tá bilurin skal skrásetast. Tað ber eisini til at leggja gjaldið á søluprís frádrigin bruttovinningur. Inntøkur landskassans og ávirkan á einstøk bilasløg verða nøkulunda óbroytt í teimum gjørdu útrokningunum, um satsirnir verða hækkaðir við 13-14%. Í tí førinum verður neyðugt at áleggja seljaranum at kunngera sín bruttovinning, og tað hevur ikki verið vanligt.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu persónvognar verða raktir av avgjaldsumleggingini. Akfør við høgum flutningskostnaði til Føroya fáa væl av hækking, meðan akfør við lítlum flutningskostnaði ikki verða rakt ella fáa lækking.

Hýruvognar og skúlavognar skulu gjalda luftalsligan part av skattafyrimunum aftur, um teir verða skrásettir til persónvogn áðrenn 3 ár. Hetta er nýtt í mun til verandi skipan.

Bussar verða lítið broyttir frá verandi skipan.

Vøruvognar av skapi sum persónvognar verða skattaðir sum persónvognar, tó skulu teir bert lata helvtina av vektargjaldinum. Hesin munurin skal, sum í gomlu skipan, gjaldast, um hann eisini verður skrásettur til persónvogn. Skattingin er her væl hægri enn í verandi skipan.

Aðrir vøruvognar og lastvognar upp til 3.500 kg totalvekt verða nakað hægri skattaðir um ikki so nógv.

Stórir lastvognar verða hægri skattaðir enn í verandi skipan, har avgjaldið er sera lítið. Tiltakið hevur samband við tað stóra byggivirksemið.

Leguvognar fáa eina lægri skatting, og verða skattaðir sum lastvognar við samsvarandi totalvekt.

Viðfestivognar upp til 1.000 kg totalvekt, t.v.s. ein støddi, ið kann brúkast saman við persónvogni, fáa nakað av hækking, meðan aðrir viðfestivognar verða skattaðir sum tilsvarandi vøruvognar. Viðfestivognar til landbúnað skulu vanliga ikki skrásetast og fáa sostatt eina lækking.

Brúkt motorakfør, tað vil í flestu førum siga skadd akfør til ístandgerð fáa eina hækking, sum lutvíst stavar frá vektgjaldinum og lutvíst frá, at virðið ikki meira skal metast, men setast út frá virði á nýggjum akfari.

Tá ið akfar skiftir eigara, verður álagt eitt nýtt umskrásetingargjald. Hetta verður hildið at vera rímuligt og er í samsvar við praksis aðrastaðir.

§§ 5-7 áleggja seljara upplýsingarskyldu. Hetta er fyri at tryggja, at virðisgjaldið verður lagt á tað tilætlaða virðið. Seljarar hava m.a. fyri neyðini at skráseta nakrar bilar í egnum navni fyri skjótt at kunna handla við bráar keyparar, og tá kundi annars ivi verið um, hvat virðisgrundarlagið skuldi verið.

Samanlagt verður talan um inntøkuvøkstur til landskassan upp á umleið

13 mió. kr. Av hesum stava góðar 2 mió. kr. frá 27 % í innflutningsgjaldi av flutningskostnaði. Inntøkumissurin av, eykalutir og dekk bert verða skattað við 27 % verður um 6,5 mió. kr.

Ein so munandi lækking av tollinum á eykalutum verður mett at føra við sær munandi betri kappingarføri hjá føroysku verkstøðunum mótvegis teim útlendsku, eins og roknast má við eini øking í verkstaðararbeiðinum.

Lógaruppskotið ber í sær, at ein betri tollaging fæst millum Føroya og okkara handilsviðskiftislond, enn sum nú er.

Tollkredittur fyri motorakfør verður hereftir væl minni.

1. viðgerð 19. september. Málið varð saman við hinum inntøkulógauppskotunum beint í skattanevndina, sum 23. september legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. í sama mánað beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men setir fram í staðin fyri uppskot landsstýrisins vegna ymsar skeivleikar soljóðandi:

Uppskot
til

løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

§ 1.

Fyri motorakfør v.m., ið innflutt verða, og sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á gjald av virði og gjald av vekt akfarsins.

2. stk. Gjaldið verður at rinda í landskassan samstundis sum akfarið verður skrásett.

§ 2.

Virðisgrundarlagið er søluprísurin frá seljara í Føroyum til keypara íroknað klárgering og íroknað at akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og eyka-

lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

For importerede motorkøretøjer m.v., der er registreringspligtige efter færdselsloven, fastsættes registreringsafgift, der bygger på en værdi- og en vægtafgift.

Stk. 2. Afgiften betales til landskassen samtidig med, at køretøjet indregistreres.

§ 2.

Værdigrundlaget er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, når køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr, men ikke medregnet

útgerð, men ikki frøknað vinningur hjá seljara, skrásetingargjald sbr. § 1, skrásetingarsýn, trygging, vegskatt o.t. í Føroyum.

2. stk. Vektgjaldsgrundarlagið er typugóðkenda totalvektin á akfarinum.

sælgers avance, registreringsgebyr, forsikring, vejskatter o.l. på Færøerne.

Stk. 2. Vægtgrundlaget er den typegodkendte totalvægt af køretøjet.

§ 3.

Persónvognar.
Virðisgjald.

§ 3

Personmotorkøretøjet.
Værdiafgift.

Undir/under kr. 15.000:	12%
kr. 15.000 - kr. 30.000:	kr. 1.8000 av/af 15.000 og 40 % av restini/af resten
kr. 30.000 - kr. 50.000:	kr. 7.800 av/af 30.000 og 75 % av restini/af resten
kr. 50.000 - kr. 65.000:	kr. 22.8000 av/af 50.000 og 90 % av restini/af resten
kr. 65.000 - kr. 80.000:	kr. 36.300 av/af 65.000 og 110% av restini/af resten
kr. 80.000 - kr. 95.000:	kr. 52.8000 av/af 80.000 og 125% av restini/af resten
kr. 95.000 og yvir/og derover:	kr. 71.550 av/af 95.000 og 150% av restini/af resten

Vektgjald
kr. 21. pr. kg.

Vægtafgift.
21 kr. pr. kg.

2. stk. Hýruvognar og skúlavognar.
Munurin millum skrásetingargjald av persónvogni og hýruvogni/skúlavogni verður endurrindaður úr landskassanum yvir eitt 2 ára skeið eina ferð árliga

Stk. 2. Hyrevogne og skolevogne.
Forskellen mellem indregistreringsafgiften for personvogn og hyre/skolevogn refunderes over en 2 årig periode een gang årlig.

3. stk. Líkningarráð Føroya váttar, at hýru-/skúlaakfarið verður nýtt sum hýru/ skúlavognur. Landsstýrið ásetir nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Stk. 3. Færøernes Ligningsråd afgiver erklæring om, at køretøjet anvendes som hyre/skolevogn. landsstyret fastsættes nærmere bestemmelser herom

4. stk. Verður hýruvognur/skúlavognur skrásettur til persónvogn áðrenn 3 ár (36 mðr.), verður gjaldið afturrindað landskassanum svarandi til tíðina, sum frestar teimum 36 mánaðum.

Stk. 4. Hvis en hyrevogn/skolevogn omregistreres til personvogn inden 3 år (36 mdr.), tilbagebetales afgiften til landskassen svarende til den resterende del af de 36 måneder.

5. stk. Virðisgjald

undir kr. 100.000:	20 %
kr. 100.001 og yvir:	kr. 2.000 av kr. 100.000 og 30 % av restini.

Stk. 5. Værdiafgift

Under 100.000 kr:	20%
100.001 kr. og derover:	20.000 kr af kr. 100.000 og 30 % af resten

Vektgjald: Einki gjald

6. stk. Vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar

Virðisgjald:
Sum persónvognar.

Vektgjald:
50 % av gjaldinum fyri persónvognar. Verður vøruvognur umskrásettur til persónvogn skal munurin í vektgjaldi rindast landskassanum.
7. stk. Bussar til 10-19 fólk førarin íroknaður.

Virðisgjald:

10-13 persónar	20 %
14-16 persónar	10 %
17-19 persónar	5 %

Vektgjald: Einki gjald.
8. Stk. Bussar til 20 fólk ella fleiri, førarin íroknaður.
Virðisgjald: Einki gjald
Vektgjald: Einki gjald

9. Stk. Last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar, stødd eftir totalvekt.
Virðisgjald:

3.500 kg og undir	20%
yvir 3.500 kg	10%

Vektgjald:

3.500 kg og undir	kr. 4 pr. kg
yvir 3.500 kg	kr. 2. pr. kg

10. stk. Avlamisvognar

Virðisgjald:	15%
Vektgjald:	Einki gjald

11. Stk. Neyðsendarakfør og líkvognar

Vægtafgift: Ingen afgift.

Stk. 6. Varevogne af type og fabrikat som personvogne .

Værdiafgift:
Som personvogne

Vægtafgift
50 % af afgiften for personvogne. Hvis varevogne omregistreres til personvogn skal forskellen i vægtafgift betales landskassen.
Stk. 7. Busser 10-19 personer, føreren iberegnet.

Værdiafgift:

10-13 personer	20 %
14-16 personer	10 %
17-19 personer	5 %

Vægtafgift: Ingen afgift
Stk. 8. Busser til 20 personer eller mere, føreren iberegnet.
Værdiafgift: Ingen afgift
Vægtafgift: Ingen afgift

Stk. 9. Last- og varevogne, dumpers og sættevogne, størrelse efter totalvekt
Værdiafgift:

3500 kg og derunder	20 %
over 3500 kg	10 %

Vægtafgift:

3500 kg og derunder	4 kr. pr. kg.
over 3500 kg.	2 kr. kg.

Stk. 10. Invalidvogne

Værdiafgift:	15 %
Vægtafgift:	Ingen afgift.

Stk. 11. Udrykningskøretøjer og rustvogne

Virðisgjald:	Einki gjald
Vektgjald:	Einki gjald

12. stk. Motorsúkklur

Virðisgjald:	110%
Vektgjald:	Einki gjald.

13. Stk. Viðfestisvognar 3.500 kg. totalvekt og undir.

Virðisgjald:	
1.000 kg og undir:	30 %
yvir 1.000 kg:	20 %
Vektgjald:	
1.000 kg og undir:	10 kr. pr. kg.
yvir 1.000 kg.:	4 kr. pr. kg.

§ 4.

Brúkt motorakfør.

Fyri brúkt motorakfør, sum verða innflutt og eru eldri enn 6 mánaðir, verður skrásetingargjaldið 90 % av gjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

§ 5.

Gjald fyri umskráseting við eigaraskifti

Fyri umskráseting av akfari við eigara skifti skulu kr. 600 verða rindaðar landskassanum.

§ 6.

Tollvaldið kann krevja alt skjala- og annað tilfar, ið seljarin av akfari nýtir sum grundarlag fyri virðis- og vekt gjaldinum, útflýggjað.

§ 7.

Seljarin hevur skyldu til at leggja fram fyri tollvaldinum teir til eina og hvørja tíð galdandi søluprísir.

2. stk. Seljarin hevur skyldu til at upplýsa um prísin fyri einum og hvørjum

Værdiafgift:	Ingen afgift
Vægtafgift:	Ingen afgift

Stk. 12. Motorcykler

Værdiafgift:	110 %
Vægtafgift:	Ingen afgift

Stk. 13. Påhængsvogne 3.500 kg totalvægt og derunder.

Værdiafgift:	
1.000 kg og derunder:	30 %
over 1.000 kg:	20 %
Vægtafgift:	
1.000 kr. og derunder:	10 kr. pr. kg.
over 1.000 kg:	4. kr. pr. kg.

§ 4.

Brugte motorkøretøjer.

For brugt motorkøretøj, der importeres og er over 6 måndeder gammelt, fastsættes registreringsafgiften til 90 % af afgiften for et tilsvarende nyt køretøj.

§ 5.

Afgift for omregistrering ved ejerskifte.

For omregistering af køretøj ved ejereskifte betales kr. 600 til landskassen

§ 6.

Toldvæsenet kan forlange alt dokumentations- og andet materiale, der af sælgeren anvendes som grundlag for værdi- og vægtafgiften, udleveret.

§ 7.

Sælgeren er forpligtet til at forelægge for toldvæsenet de til enhver tid gældende salgpriser.

Stk. 2. Sælgeren er forpligtet til at informere enhver om prisen uden at

uttan at skrásetingargjald er íroknað, og hvussu mikið skásetingargjaldið er.

§ 8.

Seljarin hevur skyldu at gera sáttmála fyri hvørt akfar, ið selt verður. Avrit av hesum sáttmála verður at lata tollvaldinum samstundis sum skrásetingargjaldið verður goldið.

§ 9.

Fritikin fyri skrásetingargjald eru akfør, ið innflutt verða sum flytigóds, tá persónur tekur fastan bústað í Føroyum. Eigarin skal tá hava verið búsettur í hinum partinum av ríkinum ella í útlandinum í minsta lagi 1 ár, og skal akfarið hava verið endaliga skrásett í hansara navni í minsta lagi 6 mánaðir í tí landinum, hann kemur úr, áðrenn hann kemur higar til landið. Persónur, ið flytir til landið, kann bert hava eitt akfar við sær. Skiftir akfarið eigara ella nýtara áðrenn 1 ár eftir skráseting, kemur tað undir skrásetingargjald.

§ 10.

Landsstýrið verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur og fyriskipanir hesi lóg viðvíkjandi.

§ 11.

Hann, sum fyri tollvaldinum gevur frásøgn, sum samsvarar ikki viðkomandi farm ella viðkomandi vøru, slag, mongd, ella virði, kemur undir bót, uttan so hann eftirfarandi prógvir, at skeivleikin stendst av viðurskiftum, sum hvørki hann sjálvur ella hann, sum var hansara vegna, hevði

registreringsafgift er medregnet og om registreringsafgiftens størrelse.

§ 8

Sælgeren er forpligetet til at udfærdige kontrakt for hvert køretøj, der handles. Genpart av kontrakten skal overlades til toldvæsenet samtidig med betaling av indregistreringsafgiften.

§ 9.

Fritaget for indregistreringsafgift er køretøjer, der indføres som rejsegods, når en person tager fast bopæl på Færøerne. Ejeren skal da have været bosiddende i den anden del af riget eller i udlandet i mindst 1 år, og køretøjet skal have været endeligt indregistreret i vedkommendes navn i mindst 6 måneder i det land, hvorfra fraflytning sker, forinden indrejse her i landet. Person, der indrejser til landet kan højst medtage 1 køretøj. Skifter køretøjet ejer eller bruger índen 1 år efter indregistrering, kommer det under indregistreringsafgift.

§ 10.

Landsstyret får bemyndigelse til med bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler og bestemmelser i forbindelse med denne lov.

§ 11.

Den, som over for toldvæsenet afgiver en angivelse, der ikke svarer til den pågældende ladnings eller de pågældende varers art, mængde eller værdi, straffes med bøde, medmindre han med sikkerhed godtgør, at urigtigheden skyldes omstændigheder, hvorpå såvel han som den, der handler på hans

havt nakað við at gera. Hann, sum givið hevur skeiva frásøgn við vilja til tess at sleppa undan tolli ella avgjaldi ella av órøttum at fáa undantaksloyvi ella endurgjald fyri avgjald ella av órættum at fáa fráskriving í upplag, ella sum átti at havt sæð, at frásøgnin var egnað at havt við sær tílíkar fylgjur, kemur undir bót, hefting ella fongsul uppí 6 mánaðir. Undir somu sektina kemur hann, sum afturat frásøgn leggur fram skjøl, sum eftir sínum innihaldi er egnað at hava við sær fylgjur, sum frammanfyri tilskilað, tá hann sá ella átti at havt sæð, at viðkomandi skjøl vóru skeiv ella høvdu brek.

§ 12.

Brot ella brotsroynd móti hesi lóg ella reglum, sum givnar eru eftir henni, sum kemur undir bót, um so er, at í hesi lógini ella í lóggávuni annars er ikki fyrisett serstøk sekt.

2. stk. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum í sjálvum sær.

vegne har været uden indflydelse. Den, der har afgivet den urigtige angivelse med forsæt til at unddrage told eller afgift, eller opnå uberettiget fritagelse for eller godtgørelse af told eller som burde have indset, at andgivelsen var egnet til at medføre følger af denne art, straffes med bøde, hæfte eller med fængsel indtil 6 måneder. Tilsvarende straffebestemmelser finder andvendelse på den, der i forbindelse med angivelse fremlægger dokumenter, hvis indhold er egnet til at medføre følger, som foran nævnt, når han indså eller burde have indset, at de pågældende dokumenter var urigtige eller mangelfulde.

§ 12.

Overtrædelse eller forsøg på overtrædelse af nærværende lov eller af de i medfør af loven givne forskrifter straffes med bøde, for så vidt der ikke i denne lov eller i lovgivning i øvrigt er fastsat særlig straf herom.

Stk. 2. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges som sådant.

§ 13.

Brot móti hesi lógini ella teim forskriftum, sum givnar eru eftir henni, kemur undir bót v.m. eftir avgerð frá tollvaldinum, uttan so tað ynskir sær avgerð hjá dómstólinum. Bøtur, sum tollvaldið leggur á, fara í landskassan.

2. stk. Avgerð hjá tollvaldinum kann av honum, sum komin er undir bót, krevjast skotin inn til avgerðar hjá dómstólinum, tá ið tað verður kravt

§ 13.

Overtrædelse af denne lov eller af de i medfør af denne lov givne forskrifter straffes med bøde m.v. i henhold til toldvæsenets afgørelse, medmindre dette måtte ønske sagen afgjort ved domstolene. Bøder, som toldvæsenet ikender, tilfalder landskassen.

Stk. 2. Den, hvem toldvæsenet har pålagt bøde, kan inden 14 dage efter bødepålægget skriftligt begære sagen

skrivliga innan 14. dagar frá tí, avgerðin varð gjørd.
3. stk. Tollvaldið stílar fyri, at málið kemur fyri dómsstólin. Tá ið mál um brot móti hesi lógini verður skotið inn til dómstólin, fer tað fram sum politimál.
4. stk. Bøtur eftir hesi lóg kunnu heintast við panting.

indbragt for retten.
Stk. 3. Sagens indbringelse for retten foranledigos af toldmyndighederne. Når sager angående overtrædelse af denne lov indbringes for domstolene, behandles de som politisager.
Stk. 4. Bøder i henhold til denne lov kan inddrives ved udpantning.

§ 14.

Tey í kapittlunum 68, 69, 70 og 72 í rættargangslógini nevndu rættarmiðal koma eisini í nýtslu í málum sum hesum í sama mun sum í málum, sum eftir vanligum reglum tilkoma statsadvokatinum at røkja. Er spurningurin at verða dømdur at sita, skal tað sigast honum, sum undir ákæru er, at hann hevur rætt at fáa uppnevnt verja. Persónar, sum hýraðir eru við skipi í uttanlandssigling og persónar, sum eru ikki búgvandi í landinum, sleppa ikki undan at fylgja avgerðini hjá tollvaldinum við at biðja um at fáa málið inn fyri rættin, til avgerð er komin frá dómstólinum.

§ 14.

De i lov om rettens pleje kap. 68, kap. 69, kap 70 og kap. 72 omhandlede retsmidler finder anvendelse på de pågældende sager i samme omfang som i sager, som det efter almindelige regler tilkommer statsadvokaten at forfølge. Er der spørgsmål om idømmelse af fængselsstraf, skal tiltalte gøres opmærksom på, at hann har ret til at få beskikket en forsvarer. Personer, der er forhyret med skibe i udenrigsfart samt personer, der ikke er bosiddende her i landet, kan ikke ved at begære sagen indbragt for domstolene, befri sig for forpligtelse til at efterkomme toldvæsenets afgørelse, indtil rettens afgørelse måtte foreligge.

§ 15.

Fyri lastbilar v.m. kann landsstýrið eftir umsókn geva undantaksloyvi í tí fyrstu vikuni eftir, at lógin er komin í gildi, tá sáttmáli við seljara og brúkara er gjørdur í seinasta lagi 17. september 1986.

§ 15.

For lastbiler m.m. kan landsstyret efter ansøgning bevilge dispensation inden for den første uge efter ikrafttrædelsen, når kontrakt med leverandør og bruger er indgået senest den 17. september 1986.

§ 16.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 16.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Ein minniluti (Agnar Nielsen) kann í høvuðsheitum taka undir við uppskotin-

um, men Sambandsflokkurin heldur tó, at gjaldið fyri lastbilar og vøruvognar sum nevnt í § 3, stk. 9 verður ov høgt, tá ein hevur í huga, at teir eisini fáa hækking orsakað av broytingini í tollroknings grundarlagnum.

Minnilutin setir tí samsvarandi hesum fram soljóðandi.

Broytingaruppskot

Í § 3 verður 9. stk. soljóðandi:	*I § 3 affattes stk. 9 således:*
»9. stk. Last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar, stødd eftir totalvekt	»Stk. 9. Last- og varevogne, dumpers og sættevogne, størrelse efter totalvægt.
Virðisgjald: Einki gjald.«	Værdiafgift: Ingen afgift.«

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein) vísir til álit sitt í løgtingsmáli nr. 13/1986: Serligt gjald á brenniolju v.m.

2. viðgerð 26. september. Í staðin fyri uppskot landsstýrisins varð broytingaruppskotið frá meirilutanum samtykt soleiðis: § 1 við 17-1, §§ 2 og 3 við 17-0, §§ 4 og 5 við 17-1, §§ 6-14 við 17-0, § 15 við 18-0, og § 16 við 17-0. Við 17-0 atkvøðum varð eisini samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

Broytingaruppskot frá minnilutanum (Agnar Nielsen) til § 3, stk. 9 fall við 7-0 atkvøðum.

29. september legði meirilutin í skattanevndini fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Í staðin fyri uppskot landsstýrisins verður sett fram fylgjandi:

Uppskot
til

løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.	*lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.*
§ 1.	*§ 1.*
Fyri motorakfør v.m., ið innflutt verða, og sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á gjald av virði og gjald av vekt akfarsins.	For inporterede motorkøretøjer m.v., der er registreringspligtige efter færdselsloven, fastsættes en registreringsafgift, der bygger på en værdi- og en vægtafgift.
2. stk. Gjaldið verður at rinda landskassanum samstundis, sum akfarið verður skrásett.	*Stk. 2.* Afgiften betales til landskassen samtidig men at køretøjet indregistreres.

§ 2.

Virðisgrundarlagið er søluprisurin frá seljara í Føroyum til keypara íroknað kláargering og íroknað, at akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og eykaútgerð, men ikki íroknað vinningin hjá seljara, skásetingargjald sbr. § 1, skrásetingarsýn, trygging, vegskatt at í Føroyum.

2. stk. Vektgjaldsgrundarlagið er typugóðkenda totalvektin á akfarinum.

§ 2.

Værdigrundlaget er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, klargøring medregnet og medregnet, at køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr, men ikke medregnet sælgers avance, registreringsafgift, jfr. § 1, registreringsgebyr, forsikring, vejskatter o.l. på Færøerne.

Stk. 2. Vægtgrundlaget er den typegodkendte totalvægt af køretøjet.

§ 3.

Persónvognar.
Virðisgjald:

Undir/under kr. 15.000: 12 %
kr. 15.000 - kr. 30.000: kr. 1.800 av/af 15.000 og 40% av restini/af resten
kr. 30.000 - kr. 50.000: kr. 7.800 av/af 30.000 og 75% av restini/af resten
kr. 50.000 - kr. 65.000: kr. 22.800 av/af 50.000 og 90% av restini/af resten
kr. 65.000 - kr. 80.000: kr. 36.300 av/af 65.000 og 110% av restini/af resten
kr. 80.000 - kr. 95.000: kr. 52.800 av/af 80.000 og 125% av restini/af resten
kr. 95.000 og yvir/og derover: kr. 71.550 av/af 95.000 og 150% av restini/af resten

Vektgjald
kr. 21 pr. kg.

§ 4. Hýruvognar og skúlavognar:
Virðisgjald: . 20%
Vektgjald: Eingi gjald.

2. stk. Líkningarráð Føroya váttar, at akfarið verður nýtt sum hýru-/skúlavognur. Landsstýrið ásetir nærri reglur hesum viðvíkjandi.

3. stk. Verður hýruvognur/skúlavognur skrásettur til persónvogn áðrenn 3 ár (36 mðr.), verður gjaldið afturrindað landskassanum svarandi til tíðina, sum frestar teimum 36 mánaðunum.

4. stk. Munurin millum skrásetingar

§ 3.

Personmotorkøretøjer:
Værdiafgift:

Under kr. 15.000: 12 %
kr. 15.000 - kr. 30.000: kr. 1.800 af/av 15.000 og 40% af/av resten
kr. 30.000 - kr. 50.000: kr. 7.800 af/av 30.000 og 75% af/av resten
kr. 50.000 - kr. 65.000: kr. 22.800 af/av 50.000 og 90% af/av resten
kr. 65.000 - kr. 80.000: kr. 36.300 af/av 65.000 og 110% af/av resten
kr. 80.000 - kr. 95.000: kr. 52.800 af/av 80.000 og 125% af/av resten
kr. 95.000 og derover: kr. 71.550 af/av 95.000 og 150% af/av resten

Vægtafgift
21. kr. pr. kg.

§ 4. Hyrevogne og skolevogne.
Værdiafgift: 20%
Vægtafgift: Ingen afgift.

Stk. 2. Færøernes Ligningsråd afgiver erklæring om, at køretøjet anvendes som hyre/skolevogn. Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser herom.

Stk. 3. Hvis en hyrevogn/skolevogn omregistreres til personvogn inden 3 år (36 måneder) tilbagebetales afgift til landskassen svarende til den resterende del af de 36 måneder.

Stk. 4. Forskellen mellem indregist-

gjald av persónvogni og hýruvogni/skútavogni verður endurrindaður yvir eitt 2 ára skeið eina ferð árliga.

§ 5.

Vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar

Virðisgjald: Sum persónvognar.

Vektgjald:

50 % av gjaldinum fyri persónvognar.

2. Stk. Verður vøruvognur umskrásettur til persónvogn skal munurin í vektgjaldi rindast landskassanum.

§ 6.

Bussar til 10 persónar ella fleiri, førarin íroknaður:

Virðisgjald: 10-13 persónar	25 %
14 - 16 persónar	13 %
17 - 19 persónar	6 %
20 ella fleiri	0 %

Vektgjald: Einki gjald.

§ 7.

Last- og vøruvognar; dumparar og leguvognar; støddd eftir totalvekt.

Virðisgjald:	
3.500 og undir	25 %
yvir 3.500	13 %
Vektgjald:	
3.500 og undir	kr. 4. pr. kg.
yvir 3.500	kr. 2. pr. kg.

§ 8.

Avlamisvongar

Virðisgjald:	20 %
Vektgjald: Einki gjald	

§ 9.

Neyðsendarakfør og líkvognar

Virðisgjald:	Einki gjald
Vektgjald:	Einki gjald

reringsafgiften for personvogn og hyre/skolevogn refunderes over en 2 årig periode een gang årlig.

§ 5.

Varevogne af type og fabrikat som personvogne.

Værdiafgift: Som personvogne.

Vægtafgift:

50 % af afgiften for personvogne.

Stk. 2. Hvis varevogn omregistreres til personvogn skal forskellen i vægtafgift betales landskassen.

§ 6.

Busser til 10 personer og derover, føreren iberegnet.

Værdiafgift: 10 13 personer	25 %
14 - 16 personer	10 %
17 - 19 personer	5 %
20 personer og derover	0 %

Vægtafgift: Ingen afgift.

§ 7

Last- og varevogne, dumpers og sættevogne, størrelse efter totalvægt.

Værdiafgift:	
3.500 kg og derunder	25 %
over 3.500 kg	13 %
Vægtafgift:	
3.500 kg og derunder	4 kr. pr. kg.
over 3.500 kg	2 kr. pr. kg.

§ 8.

Invalidevogne

Værdiafgift:	20 %
Vægtafgift: Ingen afgift.	

§ 9.

Udrykningskøretøjer og rustvogne

Værdiafgift:	Ingen afgift
Vægtafgift	Ingen afgift

§ 10.

Motorsúkklur

Virðisgjald:	140 %
Vektgjald: Eink i gjald	

§ 11.

Viðlestisvognar 3.500 kg. totalvekt og undir:

Virðisgjald:	
1.000 kg. og undir:	40 %
yvir 1.000 kg:	25 %
Vektgjald:	
1.000 kg og undir:	10 kr. pr. kg.
yvir 1.000 kg.:	4 kr. pr. kg.

§ 12.

Brúkt motorakfør

Skrásetingargjaldið er tað sama sum fyri tilsvarandi nýggj akfør. Er akfarið eldri enn 6 mánaðir, verður skrásetingargjaldið 90 % av gjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

§ 13.

Gjald fyri umskráseting við eigaraskifti.

Fyri umskráseting av akfari við eigaraskifti skulu kr. 600 verða rindaðar landskassanum.

§ 14.

Tollvaldið kann krevja alt skjalu- og annað tilfar, ið seljarin av akfari nýtir sum grundarlag fyri virðis- og vektgjaldinum, útflýggjað.

§ 15.

Seljarin hevur skyldu at gera sáttmála fyri hvørt akfar, ið selt verður. Avrit av hesum sáttmála verður at lata tollvaldinum samstundis, sum skrásetingargjaldið verður goldið.

§ 10.

Motorcykler

Værdiafgift:	140 %
Vægtafgift: Ingen afgift.	

§ 11.

Påhængsvogne 3.500 kg totalvægt og derunder.

Værdiafgift:	
1.000 kg og derunder:	40 %
over 1.000 kg:	25 %
Vægtafgift:	
1.000 kr. og derunder:	10 kr. pr. kg.
over 1.000 kg:	4 kr. pr. kg.

§ 12.

Brugte motorkøretøjer.

Registreringsafgiften fastsættes som for tilsvarende nyt køretøj. For køretøjer over 6 måneder fastsættes registreringsafgiften til 90 % af afgiften for et tilsvarende nyt køretøj.

§ 13.

Afgift for omregistrering ved ejerskifte.

For omregistrering af køretøj ved ejerskifte betales kr. 600 til landskassen.

§ 14.

Toldvæsenet kan forlange alt dokumentations- og andet materiale, der af sælgeren anvendes som grundlag for værdi- og vægtafgiften, udleveret.

§ 15.

Sælgeren er forpligtet til at udfærdige kontrakt for hvert køretøj, der handles. Genpart af kontrakten skal overlades til toldvæsenet samtidig med betaling af indregistreringsafgiften.

2. stk. Saman við søluskattmálanum hevur seljarin skyldu at lata tollvaldinum sundurgreining av samlaða søluvirðinum.
3. stk. Tollvaldið fær heimild til at fyriskipa, hvussu sundurgreiningin skal gerast.

Stk. 2. Sammen med salgskontrakt har sælgeren pligt til at fremsende en specifikation af den samlede salgsværdi til toldvæsenet.
Stk. 3. Toldvæsenet har hjemmel til at foreskrive specifikationsgraden.

§ 16.

Fritikin fyri skrásetingargjald eru akfør, ið innflutt verða sum flytigóds, tá persónur tekur fastan bústað í Føroyum. Eigarin skal tá hava verið búsettur í hinum partinum av ríkinum ella í útlandinum í minsta lagi 1 ár, og skal akfarið hava verið endaliga skrásett í hansara navni í minsta lagi 6 mánaðir í tí landinum, hann kemur úr, áðrenn hann kemur higar til landið.
2. stk. Persónur, ið flytir til landið, kann bert hava eitt akfar við sær sum flytigóds. Skiftir akfarið eigara ella nýtara áðrenn 1 ár eftir skráseting, kemur tað undir skrásetingargjald.

§ 16.

Fritaget for indregistreringsafgift er køretøjer, der indføres som rejsegods, når en person tager fast bopæl på Færøerne. Ejeren skal da have været bosiddende i den anden del af riget eller i udlandet i mindst 1 år, og køretøjet skal have været endeligt indregistreret i vedkommendes navn i mindst 6 mdr. i det land, hvorfra fraflytning sker, forinden indrejse her i landet.
Stk. 2. Person, der indrejser til landet kan højst medtage 1 køretøj som rejsegods. Skifter køretøjet ejer eller bruger inden 1 år efter indregistrering, kommer det under indregistreringsafgift.

§ 17.

Landsstýrið verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur og fyriskipanir hesi lóg viðvíkjandi.

§ 17.

Landsstyret får bemyndigelse til med bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler og bestemmelser i forbindelse med denne lov.

§ 18.

Hann, sum fyri tollvaldinum gevur frásøgn, sum samsvarar ikki viðkomandi farm ella viðkomandi vøru, slag, mongd ella virði, kemur undir bót, uttan so hann eftirfarandi prógvførir, at skeivleikin stendst av viðurskiftum, sum hvørki hann sjálvur ella hann, sum var hansara vegna, hevði havt nakað við at gera. Hann, sum givið

§ 18.

Den, som over for toldvæsenet afgiver en angivelse der ikke svarer til den pågældende ladnings eller de pågældende varers art, mængde eller værdi, straffes med bøde, medmindre han med sikkerhed godtgør, at urigtigheden skyldes omstændigheder, hvorpå såvel han som den, der handler på hans vegne, har været uden indflydelse. Den,

hevur skeiva frásøgn við vilja til tess at sleppa undan tolli ella avgjaldi av órættum at fáa fráskriving í upplag, ella sum átti at havt sæð, at frásøgnin var egnað at havt við sær tílíkar fylgjur, kemur undir bót, hefting ella fongsul uppí 6 mðr. Undir somu sektina kemur hann, sum afturat frásøgn leggur fram skjøl, sum eftir sínum innihaldi eru egnað at hava við sær fylgjur, sum frammanfyri tilskilað, tá hann sá ella átti at havt sæð, at viðkomandi skjøl vóru skeiv ella høvdu brek.

der har afgivet den urigtige angivelse med forsæt til at uddrage told eller afgift, eller opnå uberettiget fritagelse for eller godtgørelse af told eller afgift, eller uberettiget fraskrivning i oplag, eller som burde have indset, at angivelsen var egnet til at medføre følger af denne art, straffes med bøde, hæfte eller med fængsel indtil 6 mdr. Tilsvarende straffebestemmelser finder anvendelse på den, der i forbindelse med angivelse fremlægger dokumenter, hvis indhold er egnet til at medføre følger, som foran nævnt, når han indså eller burde have indset, at de pågældende dokumenter var urigtige eller mangelfulde.

§ 19.

Brot ella brotsroynd móti hesi lóg ella reglum, sum givnar eru eftir henni, kemur undir bót, um so er, at í hesi lógini ella í lóggávuni annars er ikki fyrisett serstøk sekt.

2. stk. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum í sjálvum sær.

§ 19.

Overtrædelse eller forsøg på overtrædelse af nærværende lov eller af de i medfør af loven givne forskrifter straffes med bøde, for så vidt der ikke i denne lov eller i lovgivning i øvrigt er fastsat særlig straf herom.

Stk. 2. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges som sådant.

§ 20.

Brot móti hesi lógini ella teim forskiftum, sum givnar eru eftir henni, kemur undir bót v.m. eftir avgerð frá tollvaldinum, uttan so tað ynskir sær avgerð hjá dómstólinum. Bøtur, sum tollvaldið leggur á, fara í landskassan.

2. stk. Avgerð hjá tollvaldinum kann av honum, sum komin er undir bót, krevjast skotin inn til avgerðar hjá dómstólinum, tá ið tað verður kravt skrivliga innan 14 dagar frá tí, avgerðin var gjørd.

§ 20.

Overtrædelse af denne lov eller af de i medfør af denne lov givne forskrifter straffes med bøde m.v. i henhold til toldvæsenets afgørelse, medmindre dette måtte ønske sagen afgjort ved domstolene. Bøder, som toldvæsenet ikender tilfalder landskassen.

Stk. 2. Den, hvem toldvæsenet har pålagt bøde, kan inden 14 dage efter bødepålægget skriftligt begære sagen indbragt for retten.

3. stk. Tollvaldið stílar fyri, at málið kemur fyri dómsstólin. Tá ið mál um brot móti hesi lógini verður skotið inn til dómstólin, fer tað fram sum politimál

4. stk. Bøtur eftir hesi lóg kunnu heintast við panting.

Stk. 3. Sagens indbringelse for retten foranledigus af toldmyndighederne. Når sagen angående overtrædelse af denne lov indbringes for domstolene, behandles de som politisager.

Stk. 4. Bøder i hendhold til denne lov kan inddrives ved udpantning.

§ 21.

Tey í kapitalunum 68, 69, 70 og 72 í rættargangslógini nevndu rættarmiðal koma eisini í nýtslu í málum sum hestum í sama mun sum í málum, sum eftir vanligum reglum tilkoma statsadvokatinum at røkja. Er spurningurin at verða dømdur at sita, skal tað sigast honum, sum undir ákæru er, at hann hevur rætt at fáa uppnevnt verja. Persónar, sum hýraðir eru við skipi í uttanlandssigling og persónar, sum eru ikki búgvandi í landinum, sleppa ikki undan at fylgja avgerðini hjá tollvaldinum við at biðja um at fáa málið inn fyri rættin, til avgerð er komin frá dómstólinum.

§ 21.

De i lov om rettens pleje kap. 68, 69, 70 og 72 omhandlede retsmidler finder anvendelse på de pågældende sager i samme omfang som i sager, som det efter almindelige regler tilkommer statsadvokaten at forfølge. Er der spørgsmål om idømmelse af fængselsstraf, skal tiltalte gøres opmærksom på, at han har ret til at få beskikket en forsvarer. Personer, der er forhyret med skibe i udenrigsfart samt personer, der ikke er bosiddende her i landet, kan ikke ved at begære sagen indbragt for domstolene befri sig for forpligtelse til at efterkomme toldvæsenets indtil rettens afgørelse måtte foreligge.

§ 22.

Fyri lastbilar v.m. samb. § 7 kann landsstýrið eftir umsókn geva undantaksloyvi í tí fyrstu vikuni eftir, at lógin er komin í gildi, tá sáttmáli við seljara og brúkara er gjørdur í seinasta lagi 17. september 1986.

§ 22.

For lastbiler m.m. jfr. § 7 kan landsstyret efter ansøgning bevilge dispensation inden den første uge efter ikrafttrædelsen, når kontrakt med leverandør og bruger er indgået senest den 17. september 1986.

§ 23.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 23.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

3. viðgerð 29. september. Broytingaruppskotið frá meirilutanum í skattanevndini varð samtykt við 17-0. Lógin varð seinastatt endaliga samtykt við hesi broyting 17-1 atkvøðum.
F. L. j. nr. 407-2-8. Lóg nr. 102 frá 1. okt. 1986.

10 Broyting í serliga innflutningsgjaldinum.

Ár 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig indførselsafgift.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1, verður aftan á orðið »skip« sett: »og bátar yvir 5 br. reg. tons«
2. Í § 2, stk. 2 verða nr. 11 og 17 strikað.
   Í nr. 12 verða »10.000 kr.« broyttar til: »50.000 kr.«. Í nr. 13 verða »5.000 kr.« broyttar til: »50.000 kr.«.
3. § 3 verður orðað soleiðis:
   »Innflutningsgjaldið verður roknað av gjaldskylduga virðinum.
   2. stk. Gjaldskylduga virðið verður áselt eftir reglum, fyrisettar av landsstýrinum í samsvar við ásetingunum í avtalu um nýtslu av artikul VII í Almenna sáttmálanum um tollskráir og samhandil (GATT).
   3. stk. Fylgjandi kostnaður skal leggjast aftrat fakturaprísinum, um hann ikki longu er umfataður:
   kostnaður keyparans til provisión

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 om særlig indførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 2, stk. 1, indsættes efter ordet »skibe«: »og både over 5 br. reg. tons«.
2. I § 2, stk. 2 ophæves nr. 11 og 17.
   I nr. 12 ændres »10.000 kr.« til: »50.000 kr.« I nr. 13 ændres »5.000 kr. « til: »50.000 kr.«
3. § 3 affattes således: »Den afgiftspligtige værdi beregnes på grund lag af varernes afgiftspligtige værdi.
   Stk. 2. Den afgiftspligtige værdi fastsættes på grundlag af forskrift er givet af landsstyret i overensstemmelse med bestemmelserne i aftale om anvendelse af artikel VII i Den almindelige Overenskomst om Told og Udenrigshandel (GATT).
   Stk. 3. Følgende omkostninger tillægges fakturaprisen, såfrem de ikke allerede er indeholdt deri:
   — købers omkostninger til provision

og innballing,
— royalty ella licensavgjøld, sum keyparin er skyldugur at gjalda,
— partur av søluvinningi av innfluttu vøruni, sum seljarin hevur til henda eftir avtalu.
— flutningskostnaður (flutningur, innskipan, handfaring og trygging) til innflutningsstaðið.
Fylgjandi kostnaður kann dragast frá fakturaprísinum, treytað av at tað týðiliga framgongur, at hann er íroknaður í fakturanum, og treytað av at hesin kostnaður er settur fyri seg sjálvan:
— flutningskostnaður aftan á innflutningsstaðið,
— kostnaður viðvíkjandi byggi-, innlegging- og monteringsarbeiðum eins og viðlíkahaldi, og tekniskari hjálp aftaná innflutningin av hesum vørum,
— avsláttur,
— avgjøld í Føroyum.
4. stk. Innflytarin hevur skyldu at geva tollvaldinum allar neyðturviligar upplýsingar, sum skulu til fyri at fremja tollingina (faktura, farmabræv, farmagjaldsrokning v.m.).
5. stk. Um tað veruliga virðið av einari vøru ikki kann ásetast samhært reglunum omanfyri, verður virðið ásett av tollmyndugleikunum í samsvar við GATT-reglurnar annars.
6. stk. Umrokning frá fremmandum til føroyskan pening verður eftir gjaldoyravirðinum, tann dagin tollavgreiðsla fer fram.

§ 2.

Frammanfyri nevndu gjøld verða upp-

og emballering.
— royalty eller licensafgifter, som køberen er forpligtet til at betale.
— sælgers andel af provenu ved videresalg, overdragelse eller anvendelse af indførte varer.
— leveringsomkostninger (transport, lastning og håndtering samt forsikring) til indførelsstedet.
Følgende beløb kan fratrækkes fakturaprisen, såfremt det tydeligt fremgår, at de er indeholdt deri, på betingelse af, at beløbet er særskilt anført.
— transportomkostninger efter indførselsstedet.
— omkostninger vedrørende bygnings-, installations- eller monteringsarbejde, vedligeholdelse eller teknisk bistand, som er foretaget efter indføreslen af de pågældende varer,
— rabatter,
— afgifter på Færøerne.
Stk. 4. Importøren er forpligtet til at afgive alle relevante oplysninger, der er nødvendige ved fortoldningen, til toldvæsenet (faktura, forsendelsespapirer, fragtregning m.v.).
Stk. 5. Hvis en vares virkelige værdi ikke kan fastsættes i henhold til de ovenfor anførte regler, fastsættes værdien af toldvæsenet i overensstemmelse med GATT-reglerne iøvrigt.
Stk. 6. Omregning af fremmed valuta til færøske kroner foregår efter valutakursen på indklareringsdagen.

§ 2.

Ovennævnte afgifter bliver at opkræ-

kravd dagin eftir at lógin er samtykt av øllum vørum, sum tað tolluppkrevjandi valdið hevur ikki løyvt til fría nýtslu, t.d. har gjaldkvittan ella útflýggingarloyvi ikki er givið, líka mikið um sendingin er innflutt innan henda dag.

2. stk. Landsstýrið fær heimild at geva undantaksloyvi, har serlig viðurskifti gera tað neyðugt tá fyrstu vikuna.

§ 3.

Henda lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ve dagen efter at loven er vedtaget af alle varer, som den toldopkrævende myndighed ikke har overgivet importøren til fri rådighed, f. eks. hvor der ikke foreligger kvittering for afgiften eller udleveringstilladelse, uden hensyn til, om varen er blevet indført inden ovennævnte dato.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at meddele dispensation, hvor særlige forhold skulle gøre det nødvendigt indenfor den første uge.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Virðisásetingin í føroysku tolllógunum hevur ofta verið umtalað sum virðið á vøruni fob frammanda havn. Hetta er ikki beint, tí reglurnar siga, at tollvirðið er fakturavirðið uttan at lagt er aftrat innflutningsgjald, trygging ella aðrar útreiðslur við flutningi av vøruni. Henda regla merkir, at eisini flutningskostnaður innanlands í seljaralandinum verður hildin uttanfyri.

Henda regla ger, at tað er trupult hjá tollvaldinum at áseta tollvirðið nágreiniliga, tá tað m.a. er torført at fáa skjalprógvað innanlands flutningskostnaðin í seljaralandinum.

Dømi niðanfyri vísir, hvussu virðið kann verða ásett:

Dømi (frá faktura):

Vørukostnaður smb. faktura	kr. 16.061,-
Flutningskostnaður innlendis og innskiping í europ. havn	kr. 9.640,-
	kr. 25.701,-
farmagjald til Føroya	kr. 10.710,-
Kostnaður tilsamans við bryggju í Føroyum	kr. 36.411,-
Tollingarvirði eftir galdandi skipan	kr. 16.061,-

Í alheims tollsamvinnu hevur leingi verið ásannað, at tað er neyðugt at hava gjølligari reglur fyri virðisáseting í sambandi við tolling av vørum.

Hetta m.a. tí, at ein hevur ásannað trupulleikarnar í hesum spurningi, og tí tað er avgerandi í samhandlinum millum lond, at tolling fer fram á ein samanberlig-

an hátt.

Undir alheims Tollsamvinnuráðnum er gjørd konventión um tollvirðisreglur. Tollsamvinnufelagsskapurin GATT hevur við hesari konventión sum grundarlag gjørt nágreinligar reglur um áseting av tollvirði. Hesar reglur finnast í artikul VII í GATT-konventiónini og í Avtalu um nýtslu av artikul VII í GATT-sáttmálanum. Føroyar eru partur í GATT-konventiónini.

Høvuðsreglan í virðisreglunum er at áseta *veruliga virðið* av vøruni við landamark í innflutningslandinum, t.v.s. virðið á vøruni, har hon skal tollgreiðast.

Í GATT-avtaluni um nýtslu av tollvirðinum eru uppsettar gjøldligar reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá tollvirðið skal ásetast, m.a. tá talan er um ikki heilt vanligar umstøður, t.d. um seljari og keypari eru nær knýttir at hvørjum øðrum.

Reglugerð eigur at verða gjørd, ið ásetir reglur samsvarandi.

Men fyri at geva innflytarunum møguleika at kunna seg um høvuðsreglurnar beinleiðis í tolllógini, eru tiknar við nakrar av høvuðsreglunum fyri áseting av tollvirðinum.

Virðisreglurnar sum tilskilað omanfyri verða í fyrstu syftu ikki settar inn í løgtingslóg nr. 23 frá 11. apríl 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m.

Virðisásetingin eigur sjálvandi at vera eins í øllum lógum viðvíkjandi innflutningsgjøldum, men orsakað av *at* virðisbroytingin í tollroknings grundarlagnum førir størri broytingar við sær í samlaðu tollupphæddini fyri vørubólkarnar í tolllógini frá 1950 enn í lógunum um serligt innflutningsgjald og eyka innflutningsgjald og *at* umsitingarvansarnir hjá gjaldstovuni verða øktir munandi um farmagjaldið skal greinast út á hvørja einstaka vøru, tá fleiri vørur eru á sama faktura, so leingi innflytararnir, seljararnir og skipafelagini ikki hava vant seg til nýggju reglurnar, verður bildið, at tað er rætt at geva ein skáa, soleiðis at innflytararnir og umsitingin kunnu venja seg til nýggju reglurnar eins og nærri kanning kann fara fram av nýggjum tollásetingum eftir lógini frá 1950 ella at samanarbeiða allar tríggjar lógirnar.

Ásannast má, at tær broytingar, ið skotið er upp at fremja, koma at økja munandi um arbeiðsbyrðuna hjá tollverkinum og krevja økt manningartal, eins og tað verður avgerandi neyðugt, at fólkið innanfyri tollverkið fær høvi til við skeiðum og á annan hátt at kunna seg um og seta seg væl inn í nýggju viðurskiftini, t.d. tollvirðisreglurnar.

Ein samlað broyting av tolllógini kann føra til, at ein komandi tollóg fer at byggja á alheims vøruskránna hjá tollsamvinnuráðnum (TSR-vøruskráin) og harvið fáa tolllógina í samsvar við vøruskránna, ið verður nýtt í dag sum hagtalsgrundarlag fyri inn- og útflutningi.

Ein slík broyting fer eisini at krevja, at fólkið innan tollverkið fær betri útbúgving við skeiðum, og at yngri fólk fær høvi at luttaka á tollskúla. Danska tollverkið hevur sagt frá, at einki er til hindurs fyri at fáa slíka skipan í lag.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:
Til 1: Bátar og skip undir 5 brt. skulu hereftir gjalda serligt innflutningsgjald.

Til 2: Fritøkan fyri serligt innflutningsgjald av edv-útgerð av virðinum yvir 250.000 kr. fellur burtur.

Ætlanin, at hýruvognar hava fingið eftir hesi lóg, fellur burtur, tí at teir nú koma undir skrásetingargjald.

Maskinur til handverk og iðnað og landbúnað fáa álagt serligt innflutningsgjald av fyrstu 50.000 kr. av virðinum á samlaðu tløguni hjá einum virki.

1. viðgerð 19. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. september legði fram soljóðandi.

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. september 1986 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass) tekur undir við uppskotinum, men mælir til soljóðandi

broytingaruppskot

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1, verður aftan á orðið »skip« sett: »og hátar yvir 5 br. reg. tons«

2. Í § 2, stk. 2 verða nr. 11 og 17 strikað. Í nr. 12 verða »10.000 kr.« broyttar til: »50.000 kr.«. Í nr. 13 verða »5.000 kr.« broyttar til: »50.000 kr.«.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 om særlig indførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændring:

1. I § 2, stk. 1, indsættes efter ordet »skibe«: »og både over 5 br. reg. tons«

2. I § 2, stk. 2 ophæves nr. 11 og 17. I nr. 12 ændres »10.000 kr.« til: »50.000 kr. I nr. 13 ændres »5.000 kr.« til: »50.000 kr.«

3. § 3 verður orðað soleiðis: »Innflutningsgjaldið verður roknað av gjaldskyldugu virðinum.
2. Stk. Gjaldskylduga virðið verður ásett eftir reglum, fyrisettar av landsstýrinum í samsvar við ásetningunum í avtalu um nýtslu av artikul VII í Almenna sáttmálanum um tollskráir og sambandil (GATT).
3. Stk. Hesin kostnaður skal leggjast aftrat fakturaprísinum, um hann ikki longu er umfataður:
— kostnaður keyparans til provisión og innbalIing,
— royalty ella licensavgjøld, sum keyparin er skyldugur at gjalda, partur av søluvinningi av innflutta vøruni, sum seljarin hevur til henda eftir avtalu,
— flutningskostnaður (flutningur, innskipan, handfaring og trygging) til innflutningsstaðið.
Hesin kostnaður kann dragast frá fakturaprísinum, treytað av at tað týðiliga framgongur, at hann er íroknaður í fakturanum, og treytað av at hesin kostnaður er settur fyri seg sjálavan:
— flutningskostnaður attaná innflutningsstaðið,
— kostnaður viðvíkjandi byggi-, innleggingar- og monteringsarbeiðum eins og viðlíkahaldi, og tekniskari hjálp aftaná innflutningin av hesum vørum,
— avsláttur,
— avgjøld í Føroyum.
4. stk. Innflytarin hevur skyldu at geva tollvaldinum allar neyðturviligar upplýsingar, sum skulu til fyri at fremja tollingina faktura, farmabræv, farmagjaldsrokning v.m).

3. § 3 affattes således: »Den afgiftspligtige værdi beregnes på grundlag af varernes afgiftspligtige værdi.
Stk. 2. Den afgiftspligtige værdi fastsættes på grundlag af forskrifter givet af landsstyret i overensstemmelse med bestemmelserne i Aftale om anvendelse af artikel VII i Den almindelige overenskomst om Told og Udenrigshandel (GATT).
Stk. 3. Følgende omkostninger tillægges fakturaprisen, såfremt de ikke allerede er indholdt deri:
— købers omkostninger til provision og emballering,
— royalty eller licensafgifter, som køberen er forpligtet til at betale,
— sælgers andel af provenu ved videresalg, overdragelse eller anvendelse af de indførte varer,
— leveringsomkostninger (transport, lastning og håntering samt forsikring) til indførselsstedet..
Følgende beløb kan fratrækkes fakturaprisen, såfremt de tydeligt fremgår, at de er indeholdt deri, på betingelse af, at beløbet er særskilt andført:
— transportomkostninger efter indførselsstedet,
— omkostninger vedrørende bygning-, installations- eller monteringsarbejder, vedligeholdelse eller teknisk bistand, som er foretaget efter indførslen af de pågældende varer.
— rabatter,
— afgifter på Færøerne.
Stk. 4. Importøren er forpligtet til at afgive alle relevante oplysninger, der er nødvendige ved fortoldningen, til toldvæsenet (faktura, forsendelsespapirer, fragtregning m.v).

5. stk. Um tað veruliga virðið av einari vøru ikki kann ásetast sambært reglunum omanfyri, verður virðið ásett av tollmyndugleikunum í samsvar til GATT-reglurnar annars.
6. stk. Umrokning frá fremmandum til føroyskan pening verður eftir gjaldoyravirðinum, tann dagin tollgreiðsla fer fram.

§ 2.

Frammanfyri nevndu gjøld verða uppkravd frá og við tí degi, lógin hevur gildi av øllum vørum, sum tað tolluppkrevjandi valdið hevur ikki loyvt til fría nýtslu, t.d. har gjaldkvittan ella útflýggingarloyvi ikki er givið, líka mikið um sendingin er innflutt innan henda dag.
2. stk. Landsstýrið fær heimild at geva undantaksloyvi, har serlig viðurskifti gera tað neyðugt ta fyrstu vikuna.
3. stk. Fyri bátar og skip undir 5 br. reg. tons og lastbilar v.m., samb. § 2, stk. 9 í lóg um skrásetingargjøld v.m., kann landsstýrið eftir umsókn innan fyri ta fyrstu vikuna geva undantaksloyvi, tá sáttmáli við soljara og brúkara er gjørdur í seinasta lagi 17. september 1986.

Stk. 5. Hvis en vares virkelige værdi ikke kan fastsættes i henhold til de overfor anførte regler, fastsættes værdien af toldvæsenet i overensstemmelse med GATT-reglerne iøvrigt.
Stk. 6. Omregning af fremmed valuta til færøske kroner foregår efter valutakursen på indklareringsdagen.

§ 2.

Ovennævnte afgifter bliver at opkræve dagen efter, at loven er vedtaget af alle varer, som den toldopkrævende myndighed ikke har overgivet importøren til fri rådighed, f. eks. hvor der ikke foreligger kvittering for afgiften eller udleveringstilladelse, uden hensyn til, om varen er blevet indført inden ovennævnte dato.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at meddele dipsensation, hvor særlige forhold skulle gøre det nødvendigt indenfor den første uge.
Stk. 3. For både og skibe under 5 br. tons og lastbiler m.v. i henhold til § 2, stk. 9 i lov om registreringsafgifter m.v. kan landsstyret efter ansøgning inden for den første uge efter ikrafttrædelsen bevilige dispensation, når kontrakt med leverandør og bruger er indgået senest den 17. september 1986.

§ 3.

Henda lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Ein minniluti (Agnar Nielsen) tekur ikki undir við punktunum 1 og 2 í uppskoti landsstýrisins, men tekur annars undir við broytingini frá tí sokallaðu fob- til cif-skipanina. Tó so at prosentupphæddin verður broytt soleiðis, at inntøka landskassans verður óbroytt og vørurnar sostatt ódýrari av hesi skipan. Vist

verður til álit í tingmáli nr. 12/1986: Broyting í eykainnflutningsgjøldum.
Minnilutin setir sostatt fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Pkt. 1 og 2 í § 1 verða strikað. Pkt. 3 verður pkt. 1.

Pkt. 1 og 2 i § 1 udgår. Pkt. 3 bliver til pkt. 1.

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein) vísir til álit sitt í løgtingsmáli nr. 13/1986: Serligt gjald á brenniolju v.m.

2. viðgerð 26. september. Broytingaruppskotið frá minnilutanum (Agnar Nielsen) fall við 5-0. Broytingaruppskot frá meirilutanum í skattanevndini til § 2 varð samtykt við 17-12, § 3 samtykt við 17-0. Við 17-12 atkvøðum var samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

29. september løgdu Poul Jacobs Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í uppskoti frá meirilutanum í skattanevndini verður sett fram fylgjandi

broytingaruppskot

1. Í § 1, nr. 1 verður »yvir 5 br. reg. tons« broytt til: »5 br. reg. tons og størri«.

1. I § 1, nr. 1, ændres »over 5 br. reg. tons« til: »5 br. reg. tons og derover«.

2. I § 1, nr. 2, 1. pkt. gunga út orðini: »og 17 «.

2. I § 1, nr. 2, 1. pkt. udgår ordene: »og 17«.

3. viðgerð 29. september. Broytingaruppskotið frá meirilutanum í skattanevndini varð samtykt við 17-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 17-12 atkvøðum.

F. L. j. nr. 403-6-31-1-3. Lóg nr. 100, 1. okt. 1986.

11 Broyting í innflutningsgjøldum.

Ár 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, nr. 7, verður avtikin.
2. Í § 1 verður sett sum nýtt nr. »8.06 Parabolantennur 1. stk. 10.000 kr.«
3. § 1, nr. 16.01 verður soleiðis orðað: »16.01. Amboð til skreiðing, svimjing, fót- og hondbólt, tennis, borðtennis, badminton, bæði innan- og uttandura at góðkenna alheims- og samnorrønar sáttmálar um samstarv viðvíkjandi tolli og avgjøld.«

§ 2.

Frammanfyri nevndu gjøld verða uppkravd frá og við degnum eftir, at lógin er samtykt, av øllum vørum, sum tað tolluppkrevjandi valdið hevur ikki loyvt til fría nýtslu, t.d. har gjaldkvittan ella útflýggingarloyvi ikki er givið, líka mikið um sendingin er innflutt innan henda dag.

2. stk. Landsstýrið fær heimild at geva undantaksloyvi, har serlig viðurskifti gera tað neyðugt ta fyrstu vikuna.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. § 1, nr. 7, ophæves.
2. I § 1 indsættes som nyt nr. »8.06 Parabolantenner 1. stk. 10.000 kr.«
3. § 1, nr. 16.01 affattes således: »16.01 Redskaber til kalkning, svømning, fod- og håndbold, bordtennis, badminton både uden- og inden døre, kroket og lign. af internationale og fællesnordiske konventioner om samarbejde vedrørende told- og afgiftsspørgsmål.«

§ 2.

Ovennævnte afgifter bliver at opkræve fra og med dagen efter, at loven er vedtaget, af alle varer, som den toldopkrævende myndighed ikke har overgivet importøren til fri rådighed, f. eks. hvor der ikke foreligger kvittering for afgifter eller udleveringstilladelse, uden hensyn til, om varen er blevet indført inden ovennævnte dato.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at meddele dispensation, hvor særlige forhold skulle gøre det nødvendigt indenfor den første uge.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Til 1: Punktgjaldið á dekk og slangur til bilar, traktorar oa. 25 %, fellur burtur.

Til 2: Nýggja punktgjaldið á parabolantennum fer í sjónvarpsgrunnin.

Til 3 og 4: Lystfør verða hækkað frá 20 % til 30 % í punktgjaldi, og skip og bátar undir 5 brt., sum higartil ikki hava havt punktgjald, fáa 10 %.

Til 5: Bilar og viðfestisvognar verða fluttir frá punktgjøldum til serliga lóg um skrásetingargjald. Gjald á knallertir og súkklur verða óbroytt. Gjald á tiltaks- og eykalutir, ið higartil hava verið 23 %, verður strikað.

Til 6: Reglan um, at Tryggingarsambandið metir um virðið á brúktum bilum verður strikað.

Til 7 og 9: Framleiðslugjald svarandi til punktgjaldið í innflutninginum, verður lagt á parabolantennur, framleiddar í Føroyum.

Til 8: Fyri at fáa samsvar millum skatting av føroyskt framleiddum og innfluttum øli verða framleiðslugjøldini hækkað, tí at innflutningskostnaður og pakkitilfar nú verður skattað í innflutninginum.

Til 10: Á toll- og avgjaldsøkinum finnast ymiskar avtalur og konventiónir ímillum lond til at lætta um handilssamhandið ella at vera hvørjum øðrum til hjálpar í slíkum málum, t.d. tá illgruni er um, at okkurt er farið óregluliga fram.

Í fyrstu syftu verður hugsað um konventiónina viðvíkjandi ATA-carnet og viðvíkjandi samnorrønum samstarvi á toll- og avgjaldsøkinum.

ATA-carnet reglurnar eru gjørdar fyri at fremja lættari tollviðgerð av vørum, ið verða innfluttar fyribils t.d. av framvísingarroyndum hjá sølumonnum, vørum til framsýningar o.t. ATA-carnet skipanin vil gera umsitingina hjá tollverkinum munandi lættari fyri tollavgreiðslu av vørum, ið koma fyribils til landið undir hesari skipan, eins og tað fyri føroysk virki, ið senda vørur uttanlands til framsýningar, messur o.s.fr., verður lættari at koma ígjøgnum við vørunum.

Við sammorrøna samstarvinum er at siga, at føroyska tollverkið kann fáa munandi nyttu av hesum samarbeiði, bæði fakliga, men eisini í sambandi við kanningar av fakturum o.ø.

1. viðgerð 19. september. Málið varð heint í skattanevndina, sum 23. september legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. september 1986 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini tók nevndin í móti umboðum fyri føroysku bryggjariini. Hesi vóru ónøgd við, at framleiðslugjaldið á skattaklassa I og skattaklassa A øli verður ásett við teirri grundgeving, at prísurin á donskum øli hækkar orsakað av broyttum tollingargrundarlagi.

Vórt varð fram, at framleiðslugjaldið á øli í Føroyum man vera eitt tað hægsta í heiminum (í Danmark 5,68 fyri gull, í Føroyum 16,00 kr. eftir uppskotinum).

Vórt varð fram, at hetta er eitt hóttan í móti einum føroyskum ídnaði.

Umboðini vístu eisini á, at hækkingin á ølinum rímaði illa við góðan alkoholpolitikk, tí ein her leggur stór gjøld á veikar drykkir, meðan sterkari sløg (vín og spiritus) ikki hækka munandi.

Nevndin tók viðmerkingarnar til eftirtektar.

Í sambandi við uppskot um punktgjald (punkt 2) og framleiðslugjald (punkt 9) á parabol antennum var mótmælisskriv komið frá Føroyskum Radioamatørum, hvar teir vísa á, at teir eisini nýta parabolantennur at tað neyvan var ætlanin, at hesar skuldu koma undir gjaldið.

Nevndin heitti tí á Tórbjørn Poulsen, verkfrøðing, um at koma á fund fyri at kunna nevndina um spurningin parabolantennur.

Tórbjørn Poulsen greiddi m.a. frá, at ein parabolantenna er ein antenna av serligum sniði (parabel) og verður nýtt til ymisk endamál, t.d. radaranntennur, antennur til satelitnavigatión, til radioamatørar o.s.fr., hvar móttøkurætningurin skal vera sera neyvur. Hann upplýsti, at tær parabolantennur, sum í dag verða settar upp í Føroyum, eru kostnaðarmiklar (einar 20-30.000 kr. pr. stk.), men tá teir beinleiðis sendandi satelittarnir fara at senda um stutta tíð, verður standardantennan 90 cm í diametur og fara allarhelst at liggja í prísleguni um 5-10.000 kr.

Hann mælti til eina betri orðing, um ætlanin bert er at leggja gjald á parabolantennur til sjónvarpsmóttøku frá satelittum.

Herumframt mælir meirilutin til, at punktgjaldið og framleiðslugjaldið fer í sjónvarpsgrunnin. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið er bert punktgjaldið nevnt.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass) mælir til, at orðingin viðvíkjandi parabolantennum verður broytt og setir samsvarandi hesum í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld, v.m.	*lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter m.v.*
§ 1.	*§ 1.*
Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum gjørdar verða hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. § 1, nr. 7, verður strikað.
2. Í § 1 verður sett sum nýtt nr.
»8.06 Paraholantennur til móttoku av sjónvarpssignalum umfraint gjaldið sambært pkt. 8.04, av virðinum 35 %, tó í mesta lagi 10.000 kr.«
3. § 1, nr. 16.01 verður soleiðis orðað:
»16.01 Amboð til skreiðing, svimjing, fót- og hondbólt, tennis, bordtennis, badmintun, bæði innan- og uttandura kroket et. av virðinum 20%.«
4. Í § 1 verður sett sum nýtt nr.1
»16.02 Stuttleikafør av ymiskum slagi av virðinum 30 %, 16.03 Skip og bátar undir 5 br. reg. tons av virðinum 10 %.«
5. § 1, nr. 27 verður soleiðis orðað:
»27.01. Knallertir og súkklur.
27.01 Knallertir av virðinum 53 %.
27.02 Súkklur av
virðinum 23 %.«
6. Í § 1 verður stk. 2 strikað og núverandi stk. 3 verður stk. 2.
7. Í § 10 verður aftaná »§ 1, nr 3.13« sett: »8.06«.
8. Í § 10. a verða gjørdar hesar broytingar:
»Øl: Yvir 2,25, men ikki yvir 3,70 vektprosent alkohol:
1 litur 9,25 kr.
yvir 3,70, men ikki yvir 4,60 vektprosent alkohol
1 litur 16,00 kr.«
9. Í § 10 verður skoytt uppí sum litra s:
»s. Parabolantennur til móttøku av sjónvarpssignalum av fakturavirðinum 35 % tó í mesta lagi 10,000 kr.«

1. § 1, nr. 7, ophæves.
2. I § 1 indsættes som nyt nr.
»8.06 Paraholantenner til modtagelse af fjernsynssignaler udover afgift i henhold til pkt. 8.04 af værdien 35 %, dog højest 10.000 kr.«
3. § 1, nr. 16.01 affattes således:
»16.01 Redskaber til kælkning, svømning, fod- og håndbold, bordtennis, badminton både uden- og indendørs, kroket og lign. af værdien 20%.«
4. I § 1 indsættes som nyt nr.:
16.02 Lystfartøjer af forskellig slags af værdien 30 %.
16.03 Skibe og både under 5 br. reg. tons af værdien 10 %.«
5. § 1, nr. 27, affattes således:
»27. Knallerter og cykler.
27.01 Knallerter af
værdien 53 %.
27.02 Cykler af
værdien 23 %.«
6. I § 1 ophæves stk. 2 og nuværende stk. 3 bliver stk. 2.
7. I § 10 indsættes efter »§ 1, nr 3.13«: »8.06«.
8. I § 10. a foretages følgende ændringer:
»Øl: Over 2,25 men ikke over 3,70 vægtprosent alkohol;
1 liter 9,25 kr.
over 3,70 men ikke over 4,60 vægtprocent alkohol:
1 liter 16,00 kr.«
9. I § 10 tilføjes som litra s:
»s. Parabolantenner til modtagelse af fjernsynssignaler af fakturaværdien 35 % dog højest 10.000 kr.«

10. Sum nýggj § 14b verður innsett:

»§ 14b. Í samráð við ríkismyndugleikarnar verður landsstýrið heimilað at góðkenna alheims- ella sannorrønar sáttmálar um samstarv viðvíkjandi tolli ug avgjøldum.«

10. Som ny 14b indsættes:

»14b. I samråd med rigsmyndighederne bemyndiges landsstyret til at godkende internationale og fællesnordiske konventioner om samarbejde vedrørende told- og afgiftsspørgsmål.«

§ 2.

Frammanfyri nevndu gjøld verða frá og við ti degi, lógin kemur í gildi, uppkravd av øllum vørum, sum tað tolluppkrevjandi valdið hevur ikki loyvt til fría nýtslu, t.d. har gjaldkvittan ella útflýggingarloyvi ikki er givið, líka mikið um sendingin er innflutt innan henda dag.

2. stk. Landsstýrið fær heimild at geva undantaksloyvi, har serlig viðurskifti gera tað neyðugt tá fyrstu vikuna.

3. stk. Fyri bátar og skip undir 5 br. reg. tons kann landsstýrið eftir umsókn innanfyri tá fyrstu vikuna geva undantaksloyvi, tá sáttmáli við seljara og brúkara er gjørdur í seinasta lagi 17. september 1986.«

§ 2.

Ovennævnte afgifter opkræves fra og med den dag loven træder i kraft af alle varer, som den toldopkrævende myndighed ikke har overgivet importøren til fri rådighed, f. eks. hvor der ikke foreligger kvittering for afgiften eller udleveringstilladelse, uden hensyn til, om varen er blevet indført inden ovennævnte dato.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at meddele dispensation, hvor særlige forhold skulle gøre det nødvendigt inden for den første uge.

Stk. 3. For både og skibe under 5 br. reg. tons kan landsstyret efter ansøgning inden for den første uge efter ikrafttrædelsen bevilge dispensation, når kontrakt med leverandør og bruger er indgået senest den 17. september 1986.«

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Ein minnilutin (Agnar Nielsen) vísir til støðu sambandsfloksins undir 1. viðgerð og kann ikki ganga við til hesi av landsstýrinum framløgdu uppskot um hækkan av avgjøldum og tekur ikki undir við uppskotinum.

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til álit sítt í løgtingsmáli nr. 13/1986: Serligt gjald á brenniolju v.m.

2. viðgerð 26. september. Broytingaruppskot frá meirilutanum í skattanevndini til § 1 samtykt við 17-13, § 2 við 17-0 og § 3 varð samtykt við 17-0. Við 17-13 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

29. september løgdu Poul Jacob Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass fram soljóðandi.

broytingaruppskot

Í uppskoti meirilutans í skattanevndin verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 1 broyting **1.** og **9.** verður aftaná »10.000 kr.« sett: »pr. stk.«.

I § 1 ændring **1.** og **9.** tilføjes efter »10.000 kr.«: »pr. stk.«,

3. viðgerð 29. september. Broytingaruppskotið frá meirilutanum í skattanevndini endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F. L. 403-6-31-1-1. Lóg nr. 101 frá 1. oktober 1986.

12 Broyting í eykainnflutningsgjaldinum

Ár 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 um eykainnflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður »5 %« broytt til: »6 %«.
2. § 3 verður orðað soleiðis: »Innflutningsgjaldið verður roknað av gjaldskylduga virðinum.

   2. stk. Gjaldskylduga virðið verður ásett eftir reglum, fyrisettar av landsstýrinum í samsvar við ásetningunum í avtalu um nýtslu av artikul VII í Almenna sáttmálanum um tollskráir og

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstraindførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 om ekstraindførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 1 ændres »5 %« til: »6 %«.
2. § 3 affattes således: »Den afgiftspligtige værdi beregnes på grundlag af varernes afgiftspligtige værdi.

   Stk. 2. Den afgiftspligtige værdi fastsættes på grundlag af forskrifter givet af landsstyret i overensstemmelse med bestemmelserne i aftale om anvendel-

samhandil (GATT).

3. stk. Fylgjandi kostnaður skal leggjast aftrat fakturaprísinum, um hann ikki longu er umfataður:

— kostnaður keyparans til provisión og innballing,
— royalty ella licensavgjøld, sum keyparin er skyldugur at gjalda,
— partur av søluvinningi av innfluttu vøruni, sum seljarin hevur til henda eftir avtalu,
— flutningskostnaður (flutningur, innskipan, handfaring og tryggingi) til innflutningsstaðið.

Fylgjandi kostnaður kann dragast frá fakturaprísinum, treytað av at tað týðiliga framgongur, at hann er roknaður í fakturanum, og treytað av at hesin kostnaður er settur fyri seg sjálvan:

— flutningskostnaður aftan á innflutningsstaðið,
— kostnaður viðvíkjandi byggi-, innleggingar- og monteringsarbeiðum eins og viðlíkahaldi, og tekniskari hjálp aftaná innflutningin av hesum vørum,
— avsláttur,
— avgjøld í Føroyum

4. stk. Innflytarin hevur skyldu at geva tollvaldinum allar neyðturviligar upplýsingar, sum skulu til fyri fremja tollingina (faktura, farmabræv, farmagjaldsrokning v.m.).

5. stk. Um tað veruliga virðið av einari vøru ikki kann ásetast sambært reglunum omanfyri, verður virðið ásett av tollmyndugleikunum í samsvar við GATT-reglurnar annars.

6. stk. Umrokning frá fremmandum til føroyskan pening verður eftir gjaldoyravirðinum, tann dagin tollgreiðsla

se af artikel VII i Den almindelige overenskomst om told og udenrigshandel (GATT).

Stk. 3. Følgende omkostninger tillægges fakturaprisen, såfremt de ikke allerede er indeholdt deri:

— købers omkostninger til provision og emballering,
— royalty eller licensafgifter, som køberen er forpligtet til at betale,
— sælgers andel at provenu ved videresalg, overdragelse eller anvendelse af de indførte varer,
— leveringsomkostninger (transport, lastning og håndtering samt forsikring) til indførselsstedet.

Følgende beløb kan fratrækkes fakturaprisen, såfremt det tydeligt fremgår, at de er indeholdt deri, på betingelse af, at beløbet er særskilt anført:

- transportomkostninger efter indførselsstedet,
— omkostninger vedrørende bygnings-, installations- eller monteringsarbejder, vedligeholdelse eller teknisk bistand, som er foretaget efter indførslen af de pågældende varer,
- rabatter,
— afgifter på Færøerne.

Stk. 4. Importøren er forpligtet til at afgive alle relevante oplysninger, der er nødvendige ved fortoldningen, til toldvæsenet (faktura, forsendelsespapirer, fragtregning m.v.)

Stk. 5 Hvis en vares virkelige værdi ikke kan fastsættes i henhold til de ovenfor anførte regler, fastsættes værdien af toldvæsenet i overensstemmelse med GATT-reglerne iøvrigt.

Stk. 6. Omregning af fremmed valuta

for fram.«

§ 2.

Frammanfyri nevndu gjøld verða uppkravd frá tí degi lógin kemur í gildi av øllum vørum, sum tað tolluppkrevjandi valdið hevur ikki loyvt til fria nýtslu, t.d. har gjaldkvittan ella útflýggingarloyvi ikki er givið, líka mikið um sendingin er innflutt innan henda dag.

2. stk. Landsstýrið fær heimild at geva undantaksloyvi, har serlig viðurskifti gera tað neyðugt ta fyrstu vikuna.

til færøske kroner foregår efter valutakursen på indklaringsdagen.

§ 2.

Ovennævnte afgifter bliver at opkræve fra og med den dag loven træder i kraft af alle varer, som den toldopkrævende myndighed ikke har overgivet importøren til fri rådighed, f. eks. hvor der ikke foreligger kvittering for afgiften eller udleveringstilladelse, uden hensyn til, om varen er blevet indført inden ovennævnte dato.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at meddele dispensation, hvor særlige forhold skulle gøre det nødvendigt indenfor den første uge.

Viðmerkingar:

Gjaldið verður broytt frá 5 % til 6 %. Viðmerkingar um tollvirði v.m. eru tær somu sum til lóg um serligt innflutningsgjald.

1. viðgerð 19. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. september legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 18. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. september 1986 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass) tekur undir við uppskotinum, men mælir til at hesar rættingar í lógaruppskotinum verða samtykktar og setir fram soljóðandi:

broytingaruppskot

1. Í § 1, 3. stk. verður orðið: »fylgjandi« broytt til »Hesin«.

2. Í § 2, verða orðini: »frá tí degi« broytt til: »frá og við tí degi«.

Ein minniluti (Agnar Nielsen) visir til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 10 1986 viðvikjandi broytingunum í tollroknings grundarlagnum. Minnilutin leggur eisini fram, at av tí at her er talan um eitt eykainnflutningsgjald, sum rakar allar brúksvørur, og sum varð sett í gildi undir ávísum umstøðum í 1978, metir sambandsflokkurin, at í dag er ikki neyðugt at fasthalda eitt so bogt eykainnflutningsgjald og átalar at sitandi samgonga hækkar hetta um meira, nevniliga frá 5 % til 6 %, samstundis sum uppskotið inniber eina broyting frá tí sokallaða fob til cif skipanina, sum hevur ta ávirkan at allar vørur verða nógv dýrari.

Minnilutin (Agnar Nielsen) setir tí fram soljóðandi:

broytingaruppskot

Í § 1 verður »6 %« broytt til: »3 %«. *I § 1 ændres »6 %« til: »3 %«.*

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein) visir til álit sítt í løgtingsmáli nr. 13/1986: Serligt gjald á brenniolju v.m.

2. viðgerð 26. september. Broytingaruppskotið frá minnilutanum (Agnar Nielsen) fall við 8-0. Broytingaruppskotið frá meirilutanum í skattanevndini til § 1 samtykt við 17-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 17-7 atkvøðum. Broytingaruppskot frá somu til § 2 varð samtykt við 17-0, § 2 soleiðis broytt samtykt við 17-0. Við 17-11 atkvøðum varð samtykt, at lógin skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 29. september. Uppskotið endaligu samtykt við 17 atkvøðum fyri, 12 atkvøðum ímóti.

F. L. j. nr. 403-6-31-1-2. Lóg nr. 103 frá 1. oktober 1986.

13 Serligt gjald á brenniolju v.m.

Árið 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju v.m.

§ 1.

Gjald verður lagt á innflutningin av fylgjandi vøru:

lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie m.v.

§ 1.

Ved indførsel pålægges følgende varer afgift:

a.	brenniolja	0,70 kr./liturin.
b.	smyrjiolja	0,70 kr./liturin.
c.	petroleum	0,70 kr./liturin.
d.	bensin	0,70 kr./liturin.

2. stk. Sølufeløg skulu eisini lata gjald av olju v.m. á goymslu, sum ikki er útflýggjað brúkara. *3. stk.* Gjaldið verður kravt inn saman við innkrevjingini av innflutningsgjaldinum á vørunum.

a.	brændselsolie	0,70 kr./liter
b.	smøreolie	0,70 kr./liter
c.	petroleum	0,70 kr./liter
d.	benzin	0,70 kr./liter

Stk. 2. Olieselskaber betaler også afgift af olie m.v. på lager, som ikke er leveret til bruger. *Stk. 3.* Afgifterne indkræves sammen med indkrævningen af indførselsafgiften på varerne.

§ 2.

Skip yvir 20 brt. og flogfør hava rætt til frá Føroya Gjaldstovu at fáa endurrindað tað gjald, sum tey hava goldið sambært § 1, tó ikki fyri smyrjiolju. *2. stk.* Skip og bátar undir 20 brt., sum av líkingarráðnum verða mettir at vera í vinnu, hava rætt til at fáa endurrindað tað gjald, sum tey hava goldið sambært § 1, tó ikki fyri smyrjiolju.
3. stk. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur um endurrindan av gjaldinum.

§ 2.

Skibe over 20 brt. og flyvemaskiner har ret til at få refunderet de afgifter, som de har betalt i henhold til § 1, fra Føroya Gjaldstovu, dog ikke for smøreolie. *Stk. 2.* Skibe og både under 20 brt., som af ligningsrådet anses for at være i erhvervsmæssig drift, har ret til at få refunderet de afgifter, som de har betalt i henhold til § 1, dog ikke for smøreolie.
Stk. 3. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for afgiftsrefusionen.

§. 3.

Tær inntøkur, sum landskassin fær av gjaldi sambært hesa lóg, fara í serstøk an grunn (oljugrunnin).
2. stk. Grunnurin hevur til endamáls at veita almennum stovnum og grunnum lán fyri at mótvirka lántøku uttanlands.

§ 3.

De indtægter, som landskassen får i medfør af afgifter, pålagt ifølge denne lov, tilfalder en selvstændig fond (oliefonden.)
Stk. 2. Fonden har til formål at yde lån til offentlige institutioner og fonde med henblik på at modvirke låntag

3. stk. Landsstýrið fær heimild til at áseta nærri reglur fyri virki grunnsins.

§ 4.

Brot móti hesi lóg verða sektað, heraftanrat kunnu vørur, sum roynt hevur verið at selt í stríð við givnar reglur, inndragast. Annars verða reglurnar í kap. III í løgtingslóg nr. 23, 11. februar 1950 við seinni broytingum at nýta við undantak av § 18.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 3. Landsstyret hjemles til at fastsætte nærmere regler for fondens virksomhed.

§ 4.

Overtrædelse af denne lov straffes med bøde, hvortil varer, der søges afsat i strid med de her givne bestemmelser, kan konfiskeres. Iøvrigt gælder bestemmelserne i kap. III i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer, dog med undtagelse af § 18.

§ 5.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Prísirnir á oljumarknaðinum eru óvanliga lágir í løtuni. Roknast kann við, at nýtslan av olju og øðrum vørum fer at økjast og orkusparingin at minka. Afturat kemur, at peningaríkiligheit, sum annars er í samfelagnum í løtuni, økist enn meira, og hervið nýtslumøguleikarnir. Hetta fer at geva trupulleikar fyri gjaldsjavnan, tá prísirnir fara upp aftur. Við at áleggja gjald nú kann bøtast um hetta.

Fylgjast skal við prísgongdini á oljumarknaðinum. So hvørt oljuprísirin v.m. broytist, Petroleum fevnir um petroleum til upphiting, lampur o.a., umframt turbofuel v.m. til flogfør. Bensin fevnir fyrst og fremst um bensin til bilar og bátar.

Um nýtslan verður sum í 1985, og gjaldið verður 0,70 kr./l kann roknast við, at landskassin fær hesar meirinntøkur:

Bensin (19,6 mió. litrar)	**13,3 mió. kr.**
Olja, ikki til skip (136,4 mió. litrar)	**95,2 mió. kr.**
Olja bunkrað í Føroyum (60,3 mió. litrar)[1]	**0,0 mió. kr.**
Olja bunkrað í útlandinum (59,0 mió. litrar) [1]	**0,0 mió. kr.**
Meiriinntøkur í alt	**108,5 mió. kr.**

ad § 2: Praksis hjá líkningarráðnum, tá tað ger av, um bátur verður rikin við vinnu fyri eyga ella sum frítíðarítriv, er í løtuni, at bátur, ið avreiðir fyri meiri enn 90.000 kr. um árið, er vinnubátur. Vinnubátar hava rætt til avskrivingar og aðrar frádráttir.

1. ad § 3: Við almennar stovnar og grunnar verður m.a. hugsað um Húsaláns-

grunnin, SEV, kommunur o.s.fr.

D) Skip fáa endurgoldið alt avgjaldið.

1. viðgerð 19. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. september legði fram soljóðandi:

Álit

Uppskotið varð lagt fram av landsstýrinum tann 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. september varð tað beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini í skattanevndini vóru umboð fyri føroysku yvirkisfeløgini á fundi. Yrkisfeløgini førdur fram, sum eisini ávist yvirfyri landsstýrinum, at fyriliggjandi uppskot fyrst og fremst rakar vanliga lønmóttakaran og eisini rakar neyðsynjarvørur munandi. Serliga rakar oljugjaldið sera hart. Feløgini átalaðu, at tey ongantíð høvdu fingið tíð at seta seg inn í uppskotini.

Yrkisfeløgini bóðu um at fáa eintøk av nevndarálitunum, áðrenn tey fara aftur í løgtingið.

Viðmerkingarnar vóru tiknar til eftirtektar.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul Jacob Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass) viðmerkir, at við endurskoðan av avgjaldinum sambært omanfyri standandi broytingaruppskot eigur lutfalsliga broytingin millum oljusløg og broyting í bensinprísum mótvegis oljusløgum eisini at verða tikið til umhugsunnar, serliga mett út frá orkusparandi sjónarmiðum.

Meirilutin tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at tað verður samtykt við hesum:

broytingaruppskoti

1. § 1, stk. 1 verður broytt soleiðis:	1. § 1, stk. 1 ændres således:
a. Tungolja (viskositet við 38 °C ikki minni enn 200 sec. Redwood I **0,50./liturin**	a. Fuelolie (viskositet ved 38 °C ikke mindre end 200 sec. Redwood I) **0,50 kr./liter**
b. Gasolja (viskositet við 38 °C litur 200 sec. Redwood I) **0,70 kr./liturin**	b. Gasolie (viskositet ved 38 °C liter 200 sec. Redwood I) **0,70 kr./liter**
c. Petroleum **0,50 kr./liturin**	c. Petroleum **0,50 kr./liter**
d. Smyrjiolja **0,70 kr./liturin**	d. Smørolie **0,70 kr./liter**
e. Bensin **0,70 kr./liturin**	e. Benzin **0,70 kr./liter**
2. Í § 1 verður sum nýtt stk. 4 innsett:	2. I § 1 indsættes om stk. 4.
»**4. stk.** Fyri hvørt oyra tann av prís-	»**Stk. 4.** For hver øre den af prís-

ráðnum góðkendi søluprísur á gassolju liggur omanfyri 2,15 kr./liturin minkar gjaldið á gassolju við 0,7 oyru. Gjaldið kann ikki verða negativt.«

3. § 2, 3. stk. verður orðað soleiðis: »Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um endurrindan av gjaldinum.«

rådet godkendte salgspris på gasolie ligger over 2,15 kr./liter, nedsættes afgiften med 0,7. Afgiften kan ikke være negativ.

3. § 2, 3 affattes således: »Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere regler om refusion af afgiften.«

Minnilutin (Agnar Nielsen) førir fram:

Við tí broyting, sum farin fram í samfelag okkara, má olja í dag metast at vera ein neyðsynjarvøra fyri hvørt húsarhald í Føroyum. Og ein óneyðug hækking á oljuprísin tyngir eisini nógv um hjá høvuðsvinnu okkara.

Sambandsflokkurin setti fram uppskot í seinastu tingsetu, um at eykainnflutningsgjaldið upp á olju upp á 5 % varð avtikið.

Sambandsflokkurin má tí átala, at landsstýrið við hesum uppskoti áleggur eitt eykagjald á eina so týðandi neyðsynjarvøru, sum oljan er í dag.

Sambandsflokkurin tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) kann ikki taka undir við uppskotinum frá landsstýrinum.

Um so var, at grundgevingin fyri at gjøgnumføra avgjaldshækkingar hevði verið, at fíggjarlógin annars hevði víst hall, var støðan ein onnur. Men so er ikki. Sambært upplýsingum í løgmansrøðuni á Ólavsøku 1986 verður mett, at inntøkurnar á fíggjarlógini 1986 vera 121 mió. kr. hægri enn ætlað. Sjálvt um útreiðslurnar helst eisini verða nakað hægri, so kann roknast við einum avlopi upp á eini 50 - 70 mió. kr.

Grundgevingin hjá landsstýrinum fyri hesum stóra uppkravi av avgjøldum er tað støðuga gjaldsjavnahallið og harav vaksandi uttanlandsskuldin saman við tí stóra arbeiðsvirkseminum í landinum.

Tað er rætt, at búskaparlig tiltøk eiga at verða gjørd í samband við hesar trupulleikar, men Fólkaflokkurin er grundleggjandi ósamdur við landsstýrið um, at avgjøld og harav komandi meirinntøka til landskassan hjálpa nakað sum helst til at bøta um hesi viðurskifti.

Tvørturímóti fara hesar inntøkur landskassan út aftur sum vanlig nýtsla og lán til arbeiðsvirksemi og harvið bert skapa meiri aktivitet, samstundis sum peningurin verður tikin frá teimum, sum skulu nýta hann til millum annað at rinda síni lángjøld (innlendsk ella útlendsk) við. Støðan hjá fólki verður ti hann. at antin verður sett á higartil uppspardan pening ella nýggj lán tikin.

Við teim núverandi góðu møguleikum fyri at fáa arbeiði og harav økjandi skattainntøkum er møguleiki hjá bæði landskassanum og skattaborgaranum at klára eina uppsparing við skattafrádrátti. Landskassin fær nakað minni í skatta

inntøku, men fær upp á longri sikt eisini lægri sosialar útreiðslur og veðhaldsútreiðslur, og skattaborgarin má vera peningin fyriuttan í nøkur ár, men fær hann síðani aftur við rentum og hevur havt skattafyrimunin.

Ein slík uppsparing er júst tað, sum er mest neyðugt í núverandi búskaparligu støðu landsins. Hendan uppsparingin kann nýtast til framhaldandi vinnuligar íløgur og økir um eginfíggjanina og minkar tilsvarandi til útlendska lántøku.

Eisini ynskir minnilutin at gera vart við, at tað er av stórum týdningi, at ungdómurin fær betri møguleikar at fremja uppsparing við skattligum fyrimunum. Hendan uppsparing gevur teim ungu betri útbúgvingarmøguleikar eins og betri møguleika fyri íløgum í nýstovnað vinnuvirki og/ella egin sethús ella íbúð.

Minnilutin setir tí fram lógaruppskot um uppsparing við skattafyrimuni.

Fyrsti parturin av uppskotinum loyvir eina bundna sjálvbodna uppsparing hjá einum og hvørjum skattskyldugum persóni upp á hægst kr. 10.000 árliga við tilsvarandi frádrátti í skattskyldugu inntøkuni. Upphæddin kann ikki takast út aftur fyrrenn í fyrsta lagi 4 ár aftaná, at peningurin er innsettur. Um hann verður tikin út aftur áðrenn hesa freist, verður upphæddin pluss 25 % skattað tað árið, hon verður úttikin.

Harumframt verður skotið upp, at ungfólk inntil tey fylla 23 ár, kunnu binda upp til 50.000 kr. árliga í føroyskum peningastovni og draga hesa upphædd frá í skattskyldugu inntøkuni. Henda upphædd kann uttan skattligar fylgjur takast út aftur:

1. 10 ár aftaná innsetingardagin,
2. Nýtast til íløgu í uýstovnað vinnuvirki skattgjaldarans,
3. Nýtast til innskot í nýútvegað sethús skattgjaldarans (sethús til egna nýtslu og bert eina ferð. Hjún kunnu nýta innskot til somu hús).
4. Nýtast til at gjalda útreiðslur í samband við útbúgving, sum varir í minsta lagi 2 ár (4 semestir).

Um upphæddin verður tikin út í úrtíð og ikki til nevndu endanmál, verður hon við 30 % afturatløgdum skattað tað árið, úttøkan fer fram.

Lógaruppskotið er soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslög um sjálvbodna bundna uppsparing.

§ 1.

Persónar, sum eru undir fullari skatta-

lagtingslov om frivillig opsparing.

§ 1.

Personer, som er undergivet fuld skatte

skyldu í Føroyum, kunnu fyri hvørt inntøkuár seta inn á bundna konto í føroyskum peningastovni upp til kr. 10.000,- og draga hesa upphædd frá í skattaskyldugu inntøkuni sama ár, sum hon er inngoldin.

2. stk. Verða tær einsløku inngoldnu upphæddirnar tiknar út innan 4 ár eru liðin, eftir at inngjaldingin er farin fram, skal frádrigna upphæddin við 25 % afturatløgdum teljast upp í skattskyldugu inntøkuna tað árið, peningurin verður úttikin.

pligt på Færøerne, kan for hvert indkomstår indsætte på bunden konto i et færøsk pengeinstitut op til kr. 10.000 og fradrage dette beløb i den skattepligtige indkomst det samme år, som det er indbetalt.

Stk. 2. Hvis de pågældende indbetalte beløb bliver hævet, inden der er gået 4 år efter, at indbetalingen er foretaget, skal det fratrukne beløb med tillæg af 25 % medregnes i den skattepligtige indkomst for det år, hvor beløbet bliver hævet.

§ 2.

Persónar, sum eru undir fullari skattaskyldu í Føroyum, og sum við byrjan inntøkuársins ikki eru fylt 24 ár, kunnu fyri hvørt inntøkuár seta inn á bundna konto í føroyskum peningastovni upp til kr. 50.000 og draga hesa upphædd frá í skattaskyldugu inntøkuni sama ár, sum hon er inngoldin.

2. stk. Verður peningurin tikin út uttan at tær í 3. stk. tilskilaðu treytir eru loknar, skal frádrigna upphæddin við 30 % afturatløgdum teljast upp í skattskyldugu inntøkuna tað árið, peningurin verður úttikin.

3. stk. Fritiknar fyri skattaskyldu eru tær í hesi grein nevndu peningaupphæddir, um tær:

1) verða tiknar út 10 ár aftan á innsetingardagin,
2) verða nýttar til íløgu sum eginpeningur/partapeningur í nýstovnaða vinnuvirki skattgjaldarans,
3) verða nýttar til eginpening til nýútvegað sethús ella eigaraíbúð skattgjaldarans, og hesin ikki áður hevur átt egin hús/eigaraíbúð,
4) verða nýttar til at gjalda útreiðslur

§ 2.

Personer, som er undergivet fuld skattepligt på Færøerne, og som ved indkomstårets begyndelse ikke er fyldt 24 år, kan for hvert indkomstår indsætte på bunden konto i et færøsk pengeinstitut op til kr. 50.000 og fradrage dette beløb i den skattepligtige indkomst det samme år, som det er indbetalt.

Stk. 2. Hvis beløbene hæves inden, at de i stk. 3. anførte betingelser er opfyldt, skal det fratrukne beløb med et tillæg på 30 % medregnes i den skattepligtige indkomst for det år, hvor beløbet bliver hævet.

Stk. 3. Fritaget for skattepligt er de i denne paragraf anført, beløbsstørrelser, hvis disse:

1) først hæves 10 år efter indsættelsesdatoen,
2) bliver anvendt til investering som egenkapital/aktiekapital i skatteyderens nyetablerede erhvervsvirksomhed,
3) bliver anvendt til egenkapital til nyanskaffet beboelseshus eller ejerlejlighed for skatteyderens, og den ne ikke tidligere har været ejer af

í sambandi við útbúgving, sum varir í minsta lagi 2 ár, og sum ikki verður lønt hægri enn góðkendar lærlingalønir.

eget husejerlejlighed.

4) bliver anvendt til at afholde udgifter i forbindelse med uddannelse, hvis varighed er mindst 2 år, og hvis der ikke oppebæres en løn højere end godkendte lærlingelønninger.

§ 3.

Deyr in skattskyldugi, áðrenn peningurin skattafrítt kann takast út, fellur upphæddin við tilskrivaðum rentum uttan skattskyldu til búgvið.

2. stk. Situr eftirsitandi hjúnafelagin í óskiftum búgvi, kann upphæddin ikki skattafrítt takast út fyrrenn 1 ár eftan á deyðadagin.

§ 3.

Hvis den skattepligtige dør, før beløbet kan hæves skattefrit, tilfalder beløbet med tilskrevne renter boet uden beskatning.

Stk. 2. Hvis efterlevende ægtefælle sidder i uskiftet bo, kan beløbet ikke hæves uden beskatning, før et år efter dødsdagen.

§ 4.

Fer skattgjaldarin konkurs og innistandandi sambært hesi lóg verður tikin við í konkursbúgvið, verður upphæddin at skatta sambært reglunum í § 1, 2. stk. og/ella § 2, 2. stk.

2. stk. Innistandandi eftir §§ 1 og 2 kunnu ikki veðsetast ella á annan hátt nýtast sum trygd fyri lántøku. Kreditorar skattgjaldarans kunnu ikki gera útlegg í innistandandi peninginum ella tilskrivaðum rentum.

§ 4.

Hvis skatteyderne erklæres konkurs og indestående ifølge denne lov indbragtes under konkursboet, skal beløbet beskattes i henhold til reglerne i § 1, stk. 2, og/ eller § 2, stk. 2.

Stk. 2. Indeståender i henhold til §§ 1 og 2 kan ikke pantsættes eller på anden måde anvendes som sikkerhed ved lånoptagelse. Skatteyderens kreditorer kan ikke gøre udlæg i de indestående beløb eller påløbne renter.

§ 5.

Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum/inntøkuárinum 1987. Tó verður hon eisini galdandi fyri skattaárið/inntøkuárið 1986, men tá bert umfatandi helmingin av teim í §§ 1 og 2 nevndu upphæddum.

§ 5.

Denne lov får gyldighed fra og med skatteåret/indkomståret i 1987. Dog skal den også gælde for skatteåret/indkomståret 1986, men kun omfatte halvdelen af de i §§ 1 og 2 omtalte beløbsstørrelser.

Umframt tað her framsetta lógaruppskotið um uppsparing er sera neyðugt við aðrari skipaðari uppsparing til pensiónsendamál. Hetta geldur bæði, tá ið tað snýr seg um arbeiðsmarknaðin sum heild og um einkultpersónar.

Hendan uppsparingin hevur stóran sosialan týdning, samstandis sum hon minkar vael um nýtsluna og gjaldsjavnahallið.

Minnilutin setir tí fram hetta

I Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta nevnd til at gera fullfíggjað uppskot til eina pensjónsskipan fyri arbeiðsmarknaðin. Nevndin skal vera liðug við arbeiði sítt í seinasta lagi 1. februar 1987.

Tá ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum talar um gjaldsjavnahall og ov stórt arbeiðsvirksemi, so stavar hetta fyri ein stóran part frá, at donsk kreditfeløg o.t. hava møguleika fyri at veita stór og lagalig lán til føroyskar fyritøkur, eisini til frívirði í eldri bygningum.

Landsstýrið skal geva loyvi í hvørjum einstøkum føri, og hevur tí ein vissan møguleika fyri at stýra hesi lántøku.

Fyri at hendan lántøkan ikki í ov stóran mun skal »hita upp« føroyskan bú skap, eigur landsstýrið at gera ávísar reglur fyri lántøkuni.

Minnilutin setir tí fram hetta

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at skipa so fyri, at lán veitt av donskum kreditfeløgum o.t. bert verða nýtt á hendan hátt:

1. Beinleiðis til nýíløgu,
2. Til umfíggjan,
3. Til afturrindan av øðrum útlendskum lánum,
4. Bundin í føroyskum peningastovni í minst 3 ár.

Bæði tá ið tað snýr seg um upptøku av kreditfelagslánum og øðrum útlendskum lánum og við frammanfyri nevndu spariskipanum kann roknast við øktum likviditeti í føroysku peningastovnunum. Tí er eisini neyðugt at ansa eftir, at ikki allur peningurin verður útaftur lacntur.

Minnilutin setir tí eisini fram hetta

III Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at samráðast við føroysku peningastovnarnar um at skipa fyri, at hóskandi partur av likviditeti peningastovnanna verður bundin, meðan arbeiðsvirksemi er ov stórt.

Um uppsparingarskipanirnar vórðu gjøgnumførdar, høvdu tær helst tilsamans árliga komið upp á einar 100 - 150 mió. kr.

Hetta hevði munað nógv meiria sum bremsa í búskapinum enn avgjøldini, sum bert høvdu rakt einstøku borgararnar og vinnulívið fyri síðani at verða útjavnað til aðrar partar av samfelagnum.

Avgjøldini koma helst at raka nøkunlunda soleiðis:

Olju- og bensingjøld	**108 mió.**
Eykagjald frá 5 til 6 %	**18 mió.**
Tollur av frakt, emballagu, trygging v.m.	**20 mió.**
Gjøld av ferðaseðlum	**12 mió.**
Biltollur	**13 mió.**
Vektgjøld	**7 mió.**
Gjald av sjónbondum	**2 mió.**
	180 mió.
— lækking eykalutir til bilar	**6 mió.**
	174 mió.

Oljugjøldini raka ógvuliga ósosialt av tí, at øll hava olju fyri neyðini og bert í lítlan mun er talan um luxusnýtslu. Oljan hækkar við 70 oyrum pluss 1 % eykagjald pluss 6 % av fraktini, ella umleið 80 oyru liturin. Hetta svarar til 800 kr. fyri ein tanga upp á 1.000 litrar. Og upphæddin er hin sama fyri hin láglønta sum hin høgtlønta.

Eisini vinnulívið verður hart rakt av oljuhækkingini. T.d. fer prísurin á iðnaðarfiski at lækka við umleið 5 oyrum pr. kg.

Tann nýggi cif-tollurin ella rættari nýggi tollurin á farmagjøld, emballagu, trygging og annan kostnað rakar eisini tilvildarliga í mun til rúmd og støddav vøruni og í mun til møguleikarnar fyri farmagjaldsavslátti.

Týdningarmiklar vørur sum t.d. mjøl, olja og salt dýrka við 6 % av fraktini. Aðrar sum byggitilfar dýrka við 28 % av fraktini v.m. og fyri hesar vørur er tað ein týðandi hækking.

Samanumtikið má tí sigast, at uppskot landsstýrisins

1. eru ósosial,

2. ikki hjálpa upp á gjaldsjavnahallið,
3. ikki minka um arbeiðsvirksemið,
4. skapa økt krøv um lønarhækkingar,
5. minka um rentabilitetin hjá vinnulívinum,
stutt sagt skapa størri ólag í búskapargongdini.

Minnilutin má ti mæla frá at atkvøða fyri hesum uppskotum og vísir til tey uppskot, sum minnilutin hevur sett fram í hesum áliti.

Eisini verður vist til tingmál nr. 19/1986 frá Fólkaflokkinum um lýtið av rakstraravlopi landskassans.

2. viðgerð 26. september. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Jógvan Sundstein) til §§ 1 og 2 fullu við 7 0. Uppskotini I, II og III til samtyktar frá sama fullu við ávikavist 9-0, 7-0 og 7-0 atkvøðum. Eftir uppskoti frá Fólkaflokkinum varð atkvøtt við navnakalli um broytingaruppskotið til § 1 frá meirilutanum. Hetta varð samtykt við 17 ja atkvøðum, 14 nei atkvøðum, ein var burturstaddur. Atkvøtt varð soleiðis:

Ja atkvøddu:	Sverri Midjord
	Tórolvur Mohr Olsen
	Jóannes Dalsgaard
	Jákup Lindenskov
	Hendrik Old
	Poul Jacob Olsen
	Jørgen Thomsen
	Tummas Arabo
	Páll Josephsen
	Hilmar Kass
	Signar Hansen
	Hergeir Nielsen
	Heini O. Heinesen
	Karin Kjølbro
	Øssur av Steinum
	Hans J. Debes
	Tordur Niclasen.
Nei atkvøddu:	Óli Breckmann
	Annlinnur Kallsberg
	Olaf Olsen
	Sven Aage Ellefsen
	Eyðun Viderø
	Jógvan Sundstein
	Eliesar Arge
	Pauli Ellefsen
	Ivan Johannesen

Flemming Mikkelsen
Agnar Nielsen
Jógvan I. Olsen
Jóhannes Martin Olsen
Adolf V. Hansen.

Burturstaddur: Eilif Samuelsen

§ 1 varð samtyktar við 17-0, §§ 2 - 5 vórðu samtyktar við 17-0. Við 17-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

29. september legði meirilutin í skattanevndini fram soljóðandi:

broytingaruppskot

Í broytingaruppskoti frá meirilutanum í skattanevndini verður sett fram fylgjandi:

broytingaruppskot

1. Í broyting 1. til § 1, stk. 1, litra a, verður »liturin« broytt til: »kg.«
2. Í broyting 2. verður nýtt stk. 4 orðað soljóðandi:
   »4. stk. Fyri hvørt oyra tann av prisráðnum góðkendi lægsti søluprísur á gassolju liggur omanfyri 2,15 kr./liturin frøknað oljugjaldið, minkar gjaldið á gassolju við 0,7 oyru/liturin. Gjaldið kann ikki verða negativt.«

1. I ændring 1. til § 1, stk. 1, litra a, ændres »liter« til: »kg.«
2. I ændring 2. affattes nyt stk. 4 således:
   »Stk. 4. For hver øre den af prisrådet godkendte mindste salgspris på gasolie ligger over 2,15 kr./liter, incl. oliceafgiften, nedsættes afgiften med 0,7 øre/liter. Afgiften kan ikke være negativ.«

3. viðgerð 29. september: Broytingaruppskot frá meirilutanum í skattanevndini varð samtykt við 17-0 atkvøðum. Uppskotið endaliga samtykt við 17-12 atkvøðum.

F. L. J. nr. 458-1. Lóg nr. 99 frá 1. oktober 1986.

14 Gjald av ferðaseðlum.

Ár 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um avgjald av ferðaseðlum frá og til Føroyar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 1979 um avgjald av ferðaseðlum frá og til Føroyar verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í lógaryvirskriftini ganga út orðini: »frá og til Føroyar«.
2. Í § 1 verða orðini »til landskassan uppá kr. 30 av uttanlandsferðaseðlum« broytt til: »til landskassan uppá kr. 200 av uttanlandsferðaseðlum úr Føroyum. Børn undir 15 ár og transitferðafólk vinda onki gjald«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om afgifter på billetter fra og til Færøerne.

§ 1.

I lagtingslov nr. 33 af 19. maj 1979 om afgifter på billetter fra og til Færøerne foretages følgende ændringer:

1. I lovens overskrift udgår ordene: »fra og til Færøerne«.
2. I § ændres ordene »kr. 30 til landskassen af billetter til udlandsrejser« til: »kr. 200 til landskassen af billetter til udlandsrejser fra Færøerne. Børn under 15 år og transitpassagerer fritages for afgift«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Ferðafólkatalið til og úr Føroyum er støðugt vaksandi. Tíanverri sýnist tað tó sum, at »ferðafólkajavnin«, t.e. munurin millum tað, útlendingar leggja eftir seg í Føroyum, og tað, føroyingar leggja eftir seg í útlandinum, vísir stórt hall. Við at leggja avgjald á ferðir úr Føroyum verður minkað um hugin til uttanlandsferðing føroyinga, um hvussu nógv teir hava til taks at nýta í útlandinum, samstundis við at økt verður um ta upphædd, sum útlendingar leggja eftir seg í Føroyum.

Um 60.000 ferðafólk fara úr Føroyum um árið, 30.000 við flogfari og 30.000 við skipi. Mett verður sostatt at eitt gjald uppá 200 kr. fyri ferðaseðilin úr Føroyum gevur landskassanum eina meirinntøku uppá 12 mió. kr.

Ætlanin er at krevja gjaldið inn við at áleggja skipum og flogførum, ið flyta ferðafólk umborð í Føroyum, at gjalda 200 kr. fyri ferðafólkið, børn og transittferðafólk tó undantikin.

1. viðgerð 19. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. septemb er legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. í sama mánað beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at hesar broytingar í lógartekstinum verða samtyktar:

Broytingaruppskot

Í yvirskriftini strika »um«
Í § 1 verða orðini »verður gjørd« broytt
til »verða gjørdar«

Ein minniluti (Agnar Nielsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eink uppskot fram.

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein) vísir til álit sitt í løgtingsmáli nr. 13/1986: Serligt gjald á brenniolju.

2. viðgerð 26. september. Broytingaruppskot frá meirifutanum í skattanevndini samtykt við 17-0. § 1 soleiðis broytt samtykt við 17-13 atkvøðum, § 2 við 17-0. Við 17-13 atkvøðum varð samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 29. september. Lógin endaliga samtykt við 17-12 atkvøðum.

F. L. j. nr. 451-1. Lóg nr. 104 frá 1. oktober 1986.

15 Gjald av útleigan av sjónbondum.

Á 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um gjald av útleigan av sjónbondum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at áseta reglur um gjald til landskassan uppá kr. 10 av hvørjum sjónbandi, ið verður útleigað.

lagtingslov om afgift af videobåndsudlejning.

§ 1.

Landsstyret får hjemmel til at fastsætte regler vedførende betaling af afgift til landskassen for videobåndsudlejning på 10 kr. pr. bånd.

§ 2.	*§ 2.*
Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:
Avgjaldið er lið í ætlanum um at minka um innlendis nýtslu í Føroyum.

Í 1985 vórðu innflutt gott 8.000 sjónbond til Føroya. Fyri at geva eitt avkast má hvørt sjónband í meðal útleigast umleið 30 ferðir um árið. Út frá hesum verður meirinntøkan hjá landskassanum 2,4 mió. kr. um árið.

1. viðgerð 19. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. september legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Agnar Nielsen) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at tað verður samtykt.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) vísir til álit sítt í løgtingsmál nr. 13/1986: Serligt gjald á brennolju v.m.

2. viðgerð 26. september. § 1 varð samtykt við 20-6, § 2 varð samtykt við 20-0. Við 20-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 29. september. Við 20 5 atkvøðum varð málið endaliga samtykt.

F. L. j. nr. 456-1. Lóg nr. 105 frá 1. oktober 1986.

16 Broyting í vektgjøldum.

Ár 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.	*lagtingslov om ændringer i lagtingslov om vægtafgift af motorkøretøjer m.v.*

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vektgjald av motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3 verður orðað soleiðis: »§ 3. Árligt gjald verður at rinda eftir hesi gjaldskrá:

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 fra 31. marts 1982 om vægtafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1. § 3 affattes således: »§ 3. Der svares afgift efter følgende helårlige rater:

	Vektgjald Vægtafgift kr.	Útjavningargjald Udligningsafgift kr.	Viðf. vogn, Påhængsvogn kr.
A. Persónvognar, tó ikki bussar og hýruvognar Personbiler, bortset fra busser og hyrevogne			
upp til 600 kg eginvekt indtil 600 kg egenvægt	732		
601 - 800 kg eginvekt egenvægt	978	390	
801 - 1100 kg eginvekt egenvægt	1.248	486	
1101 - 1300 kg eginvekt egenvægt	1.560	654	
1301 - 1500 kg eginvekt egenvægt	2.046	882	
1501 - 2000 kg eginvekt egenvægt	2.826	1.140	
yvir - 2000 kg eginvekt over egenvægt	3.120	1.578	
B. Hýruvognar Hyrevogne			
upp til 800 kg eginvekt indtil egenvægt	588	2.340	
801 - 1100 kg eginvekt egenvægt	780	2.928	
1101 - 1300 kg eginvekt egenvægt	1.014	3.510	
1301 - 1500 kg eginvekt egenvægt	1.326	3.804	
yvir 1500 kg eginvekt over egenvægt	1.794	4.098	

C. Motorsúkklur	486	132	
Motorcykler			
D. Bussar			
Busser			
Upp til 2000 kg eginvekt	822	1.464	
indtil egenvægt			
2001 - 4000 kg eginvekt	972	2.634	
egenvægt			
yvir - 4000 kg eginvekt	1.560	3.804	
over egenvægt			
E. Vøru- og lastvognar, traktorar o.l.			
Vare- og lastvogne, traktorer o.l.			
Upp til 1500 kg totalvekt	588	2.340	60
Indtil totalvægt			
1501 - 2000 kg totalvekt	666	2340	120
2001 - 2500	744	2490	156
2501 - 3000	816	2.634	234
3001 - 3500	900	2.928	354
3501 - 6000	978	3.510	468
6001 - 8000	1.368	4.098	702
8001 - 9000	1.560	4.680	936
9001 - 10000	1.758	5.268	1.050
10001 - 11000	1.950	5.850	1.560
11001 - 12000	2.148	6.438	1.716
yvir - 12000	2.340	7.020	1.872

2. § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis : »Gjaldskeiðini eru 6 mánaðir frá 1. januar til 30. juni og frá 1. juli til 31. december«.
3. Í § 4, 2. stk., verða orðini »mars ella september« broytt til »juni ella december«.

2. § 4, 1. stk., affattes således: »Afgiftsperioden er 6 måneder fra 1. januar til 30. juni og fra 1. juli til 31. desember.«
3. I § 4, 2. stk., ændres ordene »marts eller september« til »juni eller december«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1987.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1987.

Viðmerkingar:
Vektgjald av mororakførum hevur verið óbroytt í meira enn 4 ár.

Vektgjaldið verður hækkað við 50 %. Samstundis verður gjaldskeiðið fyri persónvognar broytt frá 12 mánaðum til 6 mánaðir.

Meirinntøkur landskassans verða mettar til 7 mió. kr. árliga.

2. viðgerð 19. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. september legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. september 1986 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at hesar broytingar í lógartekstini verða samtyktar:

Broytingaruppskot

A. 801 - 1100 kg eginvekt 1.218
C. orðið »Motorsúklur« verður broytt til »Motorsúkklur«.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskotinum men vísir til álit sítt í løgtingsmáli nr. 13/1986: Serligt gjald á brenniolju v.m.

26. september varð framlagt nýtt, broytt:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. september 1986 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at hesar broytingar í lógartekstinum verða samtyktar:

Broytingaruppskot

A. 801 - 1100 kg eginvekt 1.218
C. Orðið »Motorsúkklur« verður broytt til »Motorsúkklur«.

Minnilutin (Agnar Nielsen) førir fram:

Sum fört fram undir 1. viðgerð, kann Sambandsflokkurin ikki ganga við til hesi av landsstýrinum framløgdu uppskot um hækkan av avgjøldum og tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskotinum men vísir til álit sítt í løgtingsmáli nr. 13/1986: Serligt gjald á brenniolju v.m.

2. viðgerð 26. september. Broytingaruppskot til § 1 varð samtykt við 17 0 og 17-6.

29. september løgdu Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Í uppskoti landsstýrisins verður undir **A.** 801-1100 kg eginvekt/egenvægt »**1.248**« broytt til: »**1.218**«.

3. viðgerð 29. september Broytingaruppskot frá meirilutanum í skattanevndini endaliga samtykt við 17 atkvøðum fyri og 12 ímóti.

F. L. j. nr. 407-2-5. Lóg nr. 106 frá 1. oktober 1986.

17 Broyting í lóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

§ 3, 2. stk. verður orðað soljóðandi:

»Fyri hvønn persón sær verður persónsfrádrátturin 4.500 kr. Fyri leysar persónar yvir 67 ár og

lagtingslov om ændring af lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:

§ 3, stk. 2 affattes således:

»For hver enkelt person udgør personfradraget kr. 4.500-. For enlige personer over 67 år samt enlige

leysar persónar, sum fáa avlamis-, einkju- ella fólkapensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, verður persóns frádrátturin fyri skattaárið 1986 tó 11.000 kr. og frá og við skattaárinum 1987 tó 12.000 kr. Fyri giftar persónar yvir 67 ár og giftar persónar, sum fáa avlamis- ella fólkapensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, verður persónsfrádrátturin fyri skattaárið 1986 tó 8.200 kr. og frá og við skattaárinum 1987 tó 9.200 kr.«

personer, som oppebærer invalide- enke- eller folkepension eller oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, er personfradraget for skatteåret 1986 dog kr. 11.000,-, og med virkning fra og med skatteåret 1987 dog kr. 12.000,-. For gifte personer over 67 år samt gifte pensionister, som oppebærer invalide- eller folkepension eller oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, er personsfradraget for skatteåret 1986 dog kr. 8.200,- og med virkning fra og med skatteåret 1987 dog kr. 9.200,-.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Tað er landsstýrisins ætlan at lætta um skattaviðurskiftini hjá pensjónistum. Í hesum umfari verður skattafrádrátturin at hækka kr. 1.000 í 1986 og aftur kr. 1.000 í 1987.

1. viðgerð 19. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 17. september 1986 og undir 1. viðgerð 19. í s.m. beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd skattanevnd tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 30. september. § 1. varð samtykt við 27-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. oktober. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 430-12-45-16. Lóg nr. 116 frá 30. oktober 1986.

18 Broyting í løgtingslóg um bjálvingarstuðul til pensiónistar.

Á 1986, týsdagin 16. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensjónistar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. juni 1982 um bjálvingarstuðulslán til pensjónistar verða hesar broytingar gjørdar:

1. § 2, 3. stk. verður orðað soleiðis:
»Tá annar eigari enn nevnt í § 1, 2. stk., yvirtekur húsini, og hesin ikki er arvingur, fellur lánið til gjaldingar. Um nýggjur eigari er arvtakari, heldur avdráttar- og rentufrítøkan uppat. Um nýggjur eigari er pensiónistur, kann Almannastovan loyva, at lánið ikki fellur til gjaldingar, og at avdráttar- og rentufrítøkan heldur fram «
2. Í § 7 verður »25.000 kr.« broytt til: 45.000 kr.«
3. § 4. verður orðað soleiðis:
»Tá avdráttar- og rentufrítøkan sambært §§ 2-3 heldur uppat, og lánið ikki fellur til gjaldingar sambært § 2, 3. stk., verður bjálvingarstuðulslánið broytt soleiðis, at avdráttur og renta verða at gjalda

lagtingslov om ændring i lagtingslov om isoleringstilskudslån til pensionister:

§ 1.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om isoleringstilskudslån til pensionister.

1. § 2, stk. 3 affattes således:
»Såfremt en anden end de i § 1, stk. 2, nævnte personer bliver ejer af huset, og denne ikke er arving, forfalder lånet til betaling. Hvis den nye ejer er arving, ophører fritagelsen for afdrag og renter. Såfremt vedkommende nye ejer er pensionist, kan Almannastovan tillade, at lånet ikke forfalder til betaling, og at fritagelsen for afdrag og renter fortsætter.«
2. I § 7 ændres »25.000 kr.« til »45.000 kr.«.
3. § 4 affattes således:
»Når fritagelsen for afdrag og renter ophører i medfør af §§ 2-3, og lånet ikke forfalder til betaling i henhold til § 2, stk. 3, ændres isoleringstilskudslånet således, at der skal betales afdrag og renter efter

eftir teimum reglum, sum tá eru galdandi fyri um- og tilbyggingarlán frá Húsalánsgrunninum.«

4. Í § 11 verður 1. stk., 1. pkt., orðað soleiðis:
»Í fíggjarárinum 1987 og fylgjandi 4 fíggjarár til og við fíggjarárinum 1991 verða árliga á fíggjarløgtingslógini avsettar 3 milj. kr. til Bjálvingarstuðulslánsgrunnin, sum verður fyrisitin av Húsalánsgrunninum.«

efter de da gældende regler for om- og tilbygningslån fra »Húsalánsgrunnurin«.

4. § 11, stk. I, 1. pkt., affattes således:
»I finansåret 1987 til og med finansåret 1991 afsættes hvert år og lagtingsfinansloven 3 mill. kr. til Isoleringstilskudslånefonden, der adminstreres af »Húsalánsgrunnurin«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrið metir, at tað er rímiligt, at lánið fellur til gjaldingar, um nýggi eigarin ikki er arvtakari ella pensiónistur.

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu í uppskoti til samtyktar dagf. 31. oktober 1985 til, at upphæddin varð hækkað munandi. Eftir ummæli frá Húsalánsgrunninum (40 - 45.000 kr.) og Almannastovuni (50.000 kr.) metir landsstýrið, at upphæddin eigur at verða sett til 45.000 kr.

Mett verður, at eisini tey næstu árini er neyðugt at kunna játta bjálvingarstuðulslán.

1. viðgerð 23. september. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 28. oktober legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Føroya landsstýri hin 17. september 1986 og aftaná 1. viðgerð hin 23. september beint í løgtingsins almanna- og heilsunevnd.

Í viðmerkingunum til uppskotið vísir landsstýrismaðurin á, at løgtingsgrannskoðararnir hin 31. oktober 1985 mæltu til, at upphæddin til bjálving varð hækkað munandi.

Málið er lagt fyri Húsalánsgrunnin, ið mælir til, at upphæddin verður 40 - 45 túsund krónur.

Eftir verandi lóg er upphæddin kr. 25.000, og eftir uppskoti frá landsstýrinum verður hon hækkað til kr. 45.000.

Undir 1. viðgerð var tað onkur, sum helt, at Húsalánsgrunnurin átti at umsitið bjálvingarstuðulin, og ikki Almannastovan. Støðan er hon, at tað er Húsaláns-

grunnurin, sum umsitur málið, og at lán verður játtað við tilmæli frá Almannastovuni. Nevndin heldur, at henda skipan skal halda fram, tí Almannastovan hevur frammanundan allar neyðugar upplýsingar um ognarviðurskiftini hjá pensiónistunum.

Tað er ein samd nevnd, sum tekur tondir við teimum broytingum, sum landsstýrið mælir til at seta í verk í uppskotinum.

2. viðgerð 4. november. § 1 samtykt við 24-0 atkvøðum, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 6. november. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1010-21-1. Lóg nr. 118 frá 25. nov. 1986.

19 Avtøka av løgtingslóg um býti av rakstraravlopi landskassans.

Ár 1986, fríggjadagin 17. september legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býti av rakstraravlopi landskassans.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om fordeling af landskassens driftsoverskud.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 5 frá 25. januar 1973 um býti av rakstraravlopi landskassans fer úr gildi.

§ 1.

Lagtingslov nr. 5 af 25. januar 1973 om fordeling af landskassens driftsoverskud bliver ophævet.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá rakstrarári landskassans 1986.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra landskassens regnskabsår 1986.

Viðmerkingar:

Tað er bæði ein avoldað mannagongd og má haldast at vera búskaparliga skila leyst, at landskassans avlop tey ymisku roknskaparárini verður býtt eftir lógar-

reglum, sum gera, at meginparturin av hesum upphæddum fer út aftur í nýtslu.

Eftir lógini frá 1973 fer um triðingur av avlopinum til endurnýggjan av skipaflotanum og ein triðingur til vegir og berghol v.m. Bert hin seinasti triðingurin fer á kapitalkonto, tað vil siga til konsolidering. Ongar reglur eru um hall, tey árini. Slíkt er.

Bæði grunnurin til endurnýgging av skipaflotanum og bergholsgrunnurin eiga at fáa sínar játtanir á teim samtyktu fíggjarlógunum eins og allar aðrar játtanir. Tað ber ikki til at føra eina so tilvildarligan fíggjarpolitikk, at ymiskar játtanir avhanga av einum fíggjarlógaryvirskoti ella ikki.

Fólkaflokkurin skjýtur tí upp at avtaka lógina frá 1973, soleiðis at rakstrarúrslit landskassans altíð verður flutt til egnipening.

1. viðgerð 1. oktober 1986. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 29. januar legði fram soljóðandi:

Álit I

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 19. september 1986 og eftir 1. viðgerð tann 1. oktober 1986 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í eina meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) tekur ikki undir við uppskoti fólkafloksins og vísir til viðmerkingar samgongumeirilutans ið løgtingsmáli nr. 5/1985: Fíggjarløgtingslóg fyri árið 1987, har nevndi meiriluti tilskilar, at landsstýrið eigur at taka spurningin um býtið av yvirskoti landskassans til viðgerðar og leggja uppskot fyri tingið samsvarandi viðmerkingum í álitinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1987.

Meirilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til uppskot Sambandsfloksins í løgtingsmáli nr. 51/1988: Broyting í løgtinslóg um býti av rakstraravlopi landskassans.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) mælir til at samtykkja uppskot fólkafloksins 2. viðgerð 10. februar 1987. Biðið varð um at beina málið aftur í nevnd.

9. apríl legði fíggjarnevndin fram:

Álit II

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 19. september 1986 og eftir 1. viðgerð tann 1. oktober 1986 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í eina meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar

Hansen) tekur ikki undir við uppskoti fólkafloksins og vísir til viðmerkingar samgongumeirilutans í løgtingsmáli nr. 5/1985: Fíggjarløgtingslóg fyri ár 1987, har nevndi meiriluti tilskilar, at landsstýrið eigur at taka spurningin um býtið av yvirskoti landskassans til viðgerðar og leggja uppskot fyri tingið samsvarandi viðmerkingum í álitinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1987.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til uppskot Sambandsfloksins í løgtingsmáli nr. 51/1986: Broytling í løgtingslóg um býti av rakstraravlopi landskassans.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) mælir til at samtykkja uppskot fólkafloksins og vísir á fólkafloksins viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 5/1986, har víst verður á, at meirinntøkur landskassans í 1986 verða um 330 mió. kr. Tveir triðingar av hesi upphædd ella um 220 mió. kr. skulu sambært lóg leggjast í grunnar, sum fara út aftur í nýtslu, og hevur fólkaflokkurin tí skotið upp at avtaka hesa lóg, soleiðis at yvirskotið verður bókað á kapitalkonto.

Síðani fólkaflokkurin legði uppskot sítt fram, hevur bæði sambandsflokkurin og landsstýrið lagt líknandi uppskot fram.

Uppskot sambandsfloksins nr. 51/1986 gongur út upp á at binda 2/3 av yvirskoti landskassans uttanlands í minst 4 ár. Tað kann sigast, at hetta eru nøkulunda somu tankar sum fólkaflokkurin førdi fram í fíggjarlógarálitinum, har uppskot fólkafloksins gekk út uppá at binda likviditetir í útlendskum peningastovni, helst í teim londum, har vit hava upptikið útlendsk lán. Hetta hevði ført við sær, at vit kurstryggjaðu okkara uttanlandslántøkur.

Uppskot landsstýrisins nr. 112/1986 gongur út upp á at avtaka lógina frá 1973. Hesum kunnu vit taka undir við. Harnæst er uppskot at avseta 280 mió. kr. í ymiskar grunnar. Grundgevingin er, at í fíggjarlógini 1987 er ikki tikin hædd fyri tí veruliga tørviðum hjá berghols- og brúgvagrunni, grunni til effektiva veðhaldsbindingar og grunninum til endurnýgging av skipaflota, soleiðis at hesin er negativir. Hetta er tilsamans 205 mió. kr. Restin av peninginum skal játtast í kommunalan lánsgrunn, sum skal nýtast í staðin fyri uttanlandslántøku hjá kommununum.

Við at gjøgnumganga yvirlitið hjá grunnunum pr. 1. apríl 1987, so skyldar landskassin grunnunum,

	406,8 mió. kr.
og eigur	**120,0 mió. kr.**
er sostatt	**286, 8 mió. kr.,**

sum landskassin skyldar í dag. Sambært fyriliggjandi uppskot skulu 280 mió. kr. játtast til grunnar aftrat og verður samlaða skuldin til grunnarnar hereftir

566,8 mió. kr.

Landskassin hevur helst góðan likviditet, men neyvan møguleikar at gjalda allan hendan pening í grunnar. Fíggjarmálaráðharrin hevur í fíggjarnevndini upplýst, at gjaldstovan hevur fingið álagt at seta peningin hjá Komunala lánsgrunninum, helst um 75 mió, kr. uttanlands. Henda játtanin til kommunala láns-

grunnin verður ikki staðfest, fyrr enn landskassaroknskapurin fyri 1986 fyriliggur, helst ikki fyrr enn í november - december 1987. Hetta saman við teimum inntøkulógum, sum samtyktar vóru seinasta heyst, fara at gera, at likviditetsstøðan verður ógvuliga góð alt árið 1987, sum helst kemur at gera útslag í øktum møguleikum til forbrúkslán úr føroysku peningastovnunum.

Tí er sera umráðandi, um landsstýrið meinar nakað sum helst við at tálma nýtslu, at tær 400 - 500 mió. kr., sum verða tiknar ov nógv inn frá føroysku skattgjaldarunum og vinnulívinum, ikki fara út aftur í forbrúk. Hetta kann bert fremjast um landsstýrið tekur uppskot fólkafloksins um at binda í útlendskum peningastovnum tann partin av landskassans inntøkum, sum ikki mótsvarast av játtaðum útreiðslum.

2. viðgerð 9. apríl. Málið afturtikið av uppskotsstillaranum.

20 Løgtingslóg um eykajáttan til Ráfiskagrunnin

Ár 1986, fríggjadagur 19. september legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Olaf Olsen, Jógvan Olsen og seg sjálvan fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um eykajáttan til Ráfiskagrunnin.

§ 1.

Í fíggjarárinum 1986 verða úr landskassanum játtaðar 30 mió. kr. til Ráfiskagrunnin.

§ 2.

Upphæddin verður at taka við á eykafíggjarlóg fyri 1986.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ekstrabevilling til Råfiskefonden.

§ 1.

I finansåret 1986 bevilges af landskassen 30 mio. kr. til Råfiskefonden.

§ 2.

Beløbet skal medtages på lagtingsloven om tillægsbevilling for 1986.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við tí útliti, sum Ráfiskagrunnurin er komin við fyri nærmasta framtíð, og teimum nú aftur hækkandi útreiðslunum hjá fiskivinnuni, sær út til, at vinnan kemur í stórar trupulleikar.

Til tess at fyribyrgja, at høvuðsvinnan steðgar, halda vit tað vera rætt at lata Ráfiskagrunnin fáa meiri pening, soleiðis at avreiðingarprísirnir og studningurin annars ikki lækka. Sambært upplýsingum frá figgjarmálaráðharranum og frá fylgiskjølunum til løgmansrøðuna í 1986, verða inntøkur landskassans umleið 120 mió. kr. størri enn roknað varð við, og tí verður ikki hildið at vera neyðugt at seta reykainntøkulógir fyri at útvega hendan pening, men at útreiðslurnar verða at koma við á eykafiggjarlóg fyri 1986.

1. viðgerð 30. september. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av tingmonnunum Olafi Olsen, Jógvan I. Olsen og Adolf Hansen tann 19. september 1986 og undir fyrstu viðgerð tann 30. í sama mánaði beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur havt fund um fiskivinnustjóran um málið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jøgein Thomsen, Asbjørn Joensen, Tórður Niclasen og Signar Hansen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen og Anfinn Kallsberg) átalar, at tað ikki hevur verið vilji at fáa málið aftur í løgtingið fyrr enn nú. Undir viðgerðini hevur minnilutin ynskt at fáa upplýsingar um støðuna hjá fiskivinnuni á heysti 1986. Hetta kundi ikki lata seg gera.

Nú hevur figgjarnevndin aftur viðgjørt málið. Í hesum sambandi fekk nevndin Kjartan Hoydal at greiða sær frá støðuni hjá flotanum í dag. Nevndin fekk upplýst, at støðan hjá línubátum á saltfiskaveiðu, nótabátum og ídnaðarskipum var sera vánalig, so neyðugt var við serligum tiltøkum. Hjá ísfiskaflotanum var støðan heldur ikki góð. Fiskinøgdin 1. ársfjórðing í ár var fallin við 17 % í mun til 1. ársfjórðing fjør, og samstundis var bæði prísurin og studningur pr. kg. lækkaður. Stuðulsnevndin hevði ikki viðgjørt hvat gerast skuldi, men tá niðurstøða hjá fiskivinnuráðnum fyriliggur um uml. 1 mánaði skuldi støðan takast upp til nýggja viðgerð. Galdandi prísir og studningur eru útroknaðir út frá galdandi játtan í figgjarlógini uppá 245 mió. kr., so møguleikarnir at hækka prísirnar innan galdandi figgjarkarm eru ikki til staðar.

Meirilutin er av tí fatan, at skal vinnan ikki aftur koma í líknandi ella størri kreppu, enn seinast í 70 árunum, verður neyðugt at játta meiri pening til ráfiska- og stuðulsgrunnin. Minnilutin setir tí fram í staðin fyri lógaruppskotið frá Olafi Olsen, Jógvan I. Olsen og Adolfi Hansen soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um eykajáttan til Ráfiskagrunnin.

§ 1.

Í fíggjarárinum 1987 verða úr landskassanum játtaðar 30 mió. kr. til Ráfiskagrunnin.

§ 2.

Upphæddin verður at taka við á eykafíggjarlóg fyri 1987.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ekstrabevilling til Råfiskefonden.

§ 1.

I finansåret 1987 bevilges af landskassen 30 mio. kr. til Råfiskefonden.

§ 2.

Beløbet skal medtages på lagtingsloven om tillægsbevilling for 1987.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskot minnilutans § 1 fall við 13-0-16-3. Eftir uppskoti frá Ivan Johannesen varð atkvøtt við navnakalli'soleiðis:

Ja atkvøddu: Óli Breckmann,
Anfinn Kallsberg,
Olaf Olsen,
Eyðun Videro,
Dánjal Pauli Danielsen,
Eliesar Arge,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Agnar Nielsen,
Jógvan Ingvard Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Eilif Samuelsen,
Adolf V. Hansen.

Atkvøddu ikki: Henrik Old,
Sverri Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jóannes Dalsgaard,
Jákup Lindenskov,

Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tummas Arabo,
Asbjørn Joensen,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,
Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Hans Jacob Debes.

Burturstaddir: Svend Aage Ellefsen,
Pauli Ellefsen og
Tordur Niclasen.

Upprunauppskotið § 1 fall við 11-0 atkvøðum. Málið er sostatt burturdottið.

21 Uppskot til samtyktar viðvíkjandi flogvallarviðurskiftunum.

Ár 1986, týsdagin 30. september legði Svend Aage Ellefsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur til viðgerðar spurningin um flogvallarviðurskiftini í Føroyum.

Viðmerkingar:
Í seinastu tingsetu varð sett fram uppskot um at seta serkøna nevnd at kanna flogvallarviðurskiftini í Føroyum. Uppskotið varð ikki samtykt, men samtykti løgtingið í staðin eitt uppskot frá samferðslunevndini, har »heitt varð á landsstýrið at gera kanningar viðvíkjandi tryggleikanum og lendingarviðurskiftunum við farmaflutningi fyri eyga.«

Einki er enn frætt frá hesum kanningum.
Heilt stutta tíð eftir at løgtingið varð farið í sumarfrí frættist, at umboð fyri

Tórshavnar og Kirkjubøar kommunur høvdu tikið flogvallarmálið í egnar hendur og høvdu gjørt avtalu um, at hesar kommununrnar í felag skuldu fara undir at gera flogvøll á Glyvursnesi. Hetta hóast flogvallarviðurskifti hor á landi higartil hevur verið mál, sum hovur verið loyst í felag av lands- og ríkismyndugleikum. Harafturat er komið fram, at umboð fyri nevndu kommunur hava havt beinleiðis samráðingar við ríkismyndugleikarnar uttan um løgting og landsstýri til tess at fáa danskan stuðul til nýggja flogvøllin.

Slíka framferð eigur Foroya Løgting ikki at góðtaka, eins lítið og góðtakast kann, at bý- og bygdaráð kring landið hvørt í sínum lagi seta sær fyri og fara undir internationalar flogheavnir her og har, hvørt hetta so verður við ella uttan donskum ríkisstuðli. Tað er m.a. til tess at fáa hesi viðurskiftini »aftur uppá plass«, at málið um flogvallarviðurskiftini verður tikið fram nú, áðrenn teir avvarðandi kommunalu myndugleikarnir í Suðurstreymoy hava brúkt dýrar skattakrónur til óneydugt fyrireikingararbeiði.

Í fyriliggjandi uppskoti verður ikki víst á nakra ávísa loysn á flogvallarmálinum, men verður hinvegin roknað við, at málið eftir sína 1. viðgerð verður beint í samferðslunevndina, har uppskotsstillarin er limur, og har møguleiki vónandi verður at fáa eina skilagóða niðurstøðu, sum ein meiriluti av løgtingsmonnum kann taka undir við.

1. viðgerð 28. oktober. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av tingmanninum Svend Aage Ellefsen tann 30. september 1986 og undir 1. viðgerð tann 28. oktober beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og hildið fundir við flogvallarleiðslurna og tekniskt kønur.

Nevndin metir seg ikki hava fingið tað tilfar og upplýsingar til ta viðgerð av málinum, ið neyðugt er, og eru fundir avtalaðir við stovnar, ið kunnu lýsa tað tekniska støðið, ið talan er um.

Nevndin ásannar, at málið er so mikið umfatandi, at tað framhaldandi arbeiðið má gerast í samferðslunevndini sum milliumtingnevnd.

Sostatt setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur samferðslunevndini at halda fram við fyriliggjandi málsviðgerð, sum milliun tingnevnd og leggja málið aftur fyri løgtingið

í ólavsøkutingsetuni 1987.

2. viðgerð 9. apríl 1987. Uppskot nevndarinnar samtykt við 19-0 atkvøðum.

22 Avtøka av serliga gjaldinum á brenniolju v.m

Ár 1986, mikudagin 1. oktober legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin, fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av serligum gjaldi á brenniolju v.m.	*lagtinslov om ophævelse af lov om særlig afgift på brændselsolie m.v.*
§ 1.	*§ 1.*
Løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju v.m. fer úr gildi.	Lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie ophæves.
§ 2.	*§ 2.*
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:
Víst verður til viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 24/1986: Bundin uppsparing.

1. viðgerð 27. november. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 23: Lækkan av cykainnflutningsgjaldinum og 24: Bundin uppsparing, og vórðu tey øll beind í skattanevndina, sum 3. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð framlagt av sambandsflokkinum 1. oktober 1986 og varð eftir fyrstu viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Poul Jacob Olsen) tekur ikki

undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) vísir til álit sitt í tingmáli nr. 13/1986 og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot sambandsflokksins.

2. viðgerð 5. mars 1987. § 1 fall við 8-0 atkvøðum. Uppskotið sostatt burturfallið.

23 Lækkan av eykainnflutningsgjaldinum

Ár 1986, mikudagin 1. oktober legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin, fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um lækkan av eykainnflutningsgjaldinum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinni broytingum verður gjørd henda broyting.

Í grein 1 verður 6 % broytt til 3 %.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om nedsættelse af ekstraindførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 om ekstraindførselsafgift foretages følgende ændring.

I paragraf 1 ændres 6 % til 3 %.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 24/1986: Bundin uppsparing.

1. viðgerð 27. november. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 22: Avtøka av serligum gjaldi á brenniolju v.m. og 24: Bundin uppsparing, og vórðu tey øll beind í skattanevndina, sum 3. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð framlagt av Sambansflokkinum 1. oktober 1986 og varð eftir fyrstu viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Poul Jacob Olsen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) vísir til álit sítt í tingmáli nr. 13/1986 og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsflokksins.

2. viðgerð 5. mars 1987. § 1 fall við 9-0 atkvøðum. Uppskotið sostatt burturdottið.

24 Bundin uppsparing

Ár 1986, mikudagin 1. oktober legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin, fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um bundna uppsparing.

§ 1.

Persónur, sum er undir fullari skattaskyldu í Føroyum, skal gjalda inn til bundna uppsparing á konto í føroyskum banka ella sparikassa. Støddin á inngjaldinum er ásett í § 5.

§ 2.

Peningurin, settur inn á konto fyri bundna uppsparing, skal standa bundin í 4 ár. Aftaná 4 ár verður peningurin, saman við rentum, útgoldin eigarunum. Um kontohavarin kemur upp um pensiónsaldur, ella á annan hátt gerst pensionistur, fær hann peningin útgoldnan eftir nærr reglum, gjørdar av Føroya Landsstýri. Í ávísum førum kann Føroya Landsstýri geva undantuk frá reglunum um bundna uppsparing.

lagtinslov om bunden opsparing.

§ 1.

Person, som er undergivet fuld skattepligt på Færøerne, skal indbetale til bunden opsparing på konto i bank eller sparekasse. Indbetalingens størrelse er fastsat i § 5.

§ 2.

Beløb, indsat på konto for bunden opsparing, skal indestå på konto i 4 år. Efter 4 år udbetales beløbet, med renter, til ejeren. Når kontohaveren har pensionsalder, eller på anden måde bliver pensionist, får han beløbet udbetalt efter regler, udlærdiget af Føroya Landstyre. I vissi tilfælde kan Føroya Landstyre gøre undtagelser fra reglerne om bunden opsparing.

§ 3.

Peningur, innistandandi á konto fyri bundna uppsparing, verður av viðkomandi banka ella sparikassa placeraður uttanfyri Føroyar til hægst møguligu rentu. Føroya Landsstýri ger saman við peningastovnunum nærri reglur um renting og placering av bundna peninginum.

§ 4.

Landskassin stendur inni fyri, at peningur á konto fyri bundna uppsparing verður rentaður við minst 10 % p.a. í fýra ára skeiðnum. Rentur fyri bundna uppsparing koma ikki undir rentuskatt ella inntøkuskatt.

§ 5.

Útrokningargrundarlagið undir bundnu uppsparingin er skattskylduga inntøkan, og her afturat avskrivingar, sum eru mótroknaðar í A-intøku.

Bundna uppsparingin er:

Fyri kr.:	Fyrst kr.:	Og síðan í %:
35.000	400	3
45.000	550	4
55.000	950	5
65.000	1.450	6
75.000	2.050	7
85.000	2.750	7
95.000	3.450	7
125.000	5.550	7
175.000	9.050	7
225.000	12.550	7
275.000	16.050	7
350.000	21.300	7
500.000	31.850	7

§ 6.

Peningur á konto fyri bundnari uppsparing kann ikki setast í veð.

§ 3.

Beløb, indestående på konto for bunden opsparing, skal af vedkommende bank eller sparekasse placeres udenfor Færøerne til højst mulig forrentning. Føroya Landsstyre udfærdiger, sammen med pengeinstituterne nærmere regler for forretning og placering af de bundne midler.

§ 4.

Landskassen indestår for at beløb på konto for bunden opsparing bliver forrentet med mindst 10 % p.a. i den fire årig periode. Renter fra den bunde opsparing er ikke rente- eller indkomstskattepligtige.

§ 5.

Beregningsgrundlaget for den bundne opsparing er den skattepligtige indkomst, tillagt de afskrivninger, der er modregnet i A-indkomst.

Den bundne opsparing er:

For kr.:	Først kr.:	Dernæst i %.
35.000	400	3
45.000	550	4
55.000	950	5
65.000	1.450	6
75.000	2.050	7
85.000	2.750	7
95.000	3.450	7
125.000	5.550	7
175.000	9.050	7
225.000	12.550	7
275.000	16.050	7
350.000	21.300	7
500.000	31.850	7

§ 6.

Beløb på konto for bunden opsparing kan ikke pantsættes.

§ 7.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 7.

Denne lov træder i kraft strakst.

Viðmerkingar:

Føroya Landsstýri hevur fyri heilt stuttum fingið samtykt eina rað av toll- og avgjaldshækkanum. Hesar føra við sær, at millum 175 og 200 milj. kr. verða tiknar frá borgaranum og føroysku vinnuni inn í landskassan.

Í sambandi við 3. viðgerð av hesum málum heitti Sambandsflokkurin á landsstýri og samgongu um at taka aftur uppskotið um oljuavgjaldið uppá 70 oyru liturin og uppskotið um at hækka eykainnflutningsgjaldið úr 5 upp í 6 %. Hetta hendi tíverri ikki.

Enn er so stutt tíð farin síðani samtyktina, at lætt er at broyta mannagongdina á hesum øki betra vegin. Umsitingin hevur enn ikki likið hædd fyri hesum meirinntøkum, og borgarin vil heldur enn fegin hava eina aðra loysn uppá spurningin.

Sum fleiri ferðir borið fram, tekur sambandsflokkurin undir við, at tað er neyðugt at avmarka keypiorkuna í Føroyum. Nýtslan er alt ov stór, bæði á tí almenna og á tí privata økinum.

Júst, tí er tað skeivt at beina tann peningin, sum tikin verður frá privata økinum, inn í landskassan.

Undir verandi umstøðum er tað ikki minst landsstýrið og stovnar tess sum eiga at halda aftur, bæði tá talan er um útreiðslur og íløgur.

Við hesum leggur sambandsflokkurin fram eitt uppskot, sum førir við sær, at munandi peningur hjá tí privata verður tikin burtur úr nýtsluni og bundin á eina sovorðnan hátt, at peningurin ikki fremur aðra nýtslu ístaðin á øðrum samfelagsøkjum.

Í hesum uppskoti vendir tann tungi endi ikki niðureftir, tvørturímóti. Samanber ein við nýggju inntøkulógaruppskot landsstýrisins, so sleppa tey allarveikastu í samfelagnum, við skattaskyldugari inntøku minni enn kr. 35.000,-, eftir okkara uppskotum undan oljuavgjaldi og eisini undan nýggju toll og avgjaldshækkanunum, uttan at skula lata nakað aftur fyri. Tey, sum hava eina skattskylduga inntøku millum kr. 35.000,- og kr. 150.000,- sleppa eisini undan áðurnevndu hækkingum, men skulu binda ein part av hesum peningi sum bundna uppsparing. Enntá tey, sum liggja undan fyri kr. 150.000,- í skattskyldugari inntøku sleppa undan avgjaldshækkanum landsstýrisins, men mugu binda henda pening og nakað afturat á serligari konto í banka ella sparikassa, sum aftur tryggjar, at peningurin ikki kemur í nýtslu í tí føroyska samfelagnum tey fyrstu 4 árini.

Vert er at undirstrika, at uppspardi bundni peningurin er ogn spararans, og verður útgoldin aftaná 4 ár við rentu og rentu av rentu.

Uppskotið førir nevniliga við sær, at øll rentan av tí bundna peninginum skal góðskrivast uppspararanum. Tá peningurin skal placeraast uttanlands, er ikki

lætt at meta um, hvussu stór hendan rentan verður. Leita vit fá ár aftur í tíðina, so var rentan t.d. í Danmark munandi hægri enn í Føroyum. Fyri hálvum ári síðan var støðan tann umvenda. Í dag liggur rentustøðið á nøkulunda somu hædd í Føroyum og í Danmark. Okkara metan er, at positiva ávirkanin av hesum reglum er so munandi, at samfelagið hevur ráð til at tryggja uppsparurunum eina minimumsrentu uppá 10 % skattafrítt. Hetta skal skiljast soleiðis, at landskassin skal gjalda munin millum veruligu rentuna av innistandandum uttanlands og tey 10 %. Skilligt er, at hetta krevur samráðingar við bankar og sparikassar, eisini um spurningin um rentumarginal av bundna peninginum, og tær samráðingar kann ein andstøðuflokkur jú ikki føra, men har aftur ímóti Føroya Landsstýri. Føroya Landsstýri eigur eisini saman við Líkningarráð Føroya at finna fram til lættastu loysnina viðv. innkrevjingini av bundnu uppsparingini. Ivaleyst er neyðugt við einari fyribilsloysn, áðrenn neyðugar programbroytingar á Elektron eru gjørdar.

Uppskotið gongur annars út uppá:

1. At avtaka oljuavgjaldið uppá 70 oyru pr. litur og at minka um toll- og avgjaldsinntøkur landskassans niður móti tí støði, tær hava havt inntil fyri heilt stuttum. Hetta er innihaldið í tveimum øðrum lógaruppskotum.
2. At áleggja øllum borgarum, sum hava eina skattskylduga inntøku uppá kr. 35.000,- ella meira, eina bundna uppsparing. Hendan verður fyri tær lægru inntøkurnar minni enn spardi peningurin frá avtøku av oljugjaldi og minking av tolli og avgjøldum annars. Eftir hesum uppskoti missir borgarin sostatt ongan pening, og hann hevur eintá í lægra endanum og heilt upp til eina skattskylduga inntøku uppá kr. 150.000,- meira pening at ráða yvir, enn út frá loysn landsstýrisins.
3. Peningurin frá bundnu uppsparingini verður uppkravdur saman við inntøkuskattinum, settur inn á konto í banka- ella sparikassa eftir ynski skattaborgarans og bundin har í 4 ár.
4. Avtala verður gjørd við peningastovnarnar um, at allur peninguriu frá bundnu uppsparingini verður placeraður uttanlands til best møguliga rentu.
5. Rentan av bundna peninginum, í minsta lagi 10 % p.a. yvir tey 4 árini, verður tilskrivað avvarðandi konto, og er skattafrí inntøka hjá skattaborgaranum.
6. Tá 4 ár eru liðin, verður bundin peningur, saman við tilskrivaður rentu, útgoldin skattaborgaranum eftir nærri reglum. Um persónur kemur upp um pensiónsaldur, ella á annan hátt kemur undir pensión, t.d. avlamispensión, verður bundni peningurin útgoldin, peningur fyri eitt bindingarár hvørt árið. Landsstýrið fær heimild til at gera onnur undantøk frá reglunum, t.d. tá talan er um útbúgving e.l..
7. Útrokningargrundarlagið fyri bundna uppsparing skal vera skattskylduga inntøkan, økt við teimum avskrivingum, sum eru mótroknaður í A-inntøku hjá viðkomandi borgara.

Verða hesar reglur samtyktar, fáa tær sera stóra ávirkan á búskaparligu gongdina í okkara samfelag.

Tað, at peningurin verður ogn skattaborgarans, og hartil avkastar rentur til hansara, hevur í sjálvum sær alstóran týdning. Oljugjøld og toll v.m. sær borgarin ongantíð aftur, ið hvussu so er ikki sum kontantan pening. Tvørturímóti verða tey brúkt av landskassanum og stovnum tess til nýtslufremjandi endamál.

Hertil kemur, at peningurin eftir hesum uppskoti verður placeraður uttanlands, og tí ikki á nakran hátt kann økja um peninganýtsluna, og harvið keypiorkuna, aðra staðni í samfelagnum. Hetta í sjálvum sær gevur nógv minni aktivitet og nýtslu, og harvið minni nettouttanlandsskuld, enn um peningurin fer inn í landskassan og síðan verður nýttur av tí almenna. Sum kunnugt økir vaksandi almenn nýtsla serliga nógv um aktivitetin, og skapar eitt enn meira yvirupphitað samfelag.

Viðmerkjast kann eisini, at sjálvt í teimum førum, har skattgjaldarin nýtir longu uppspardan pening til bundna uppsparing, verður kortini talan um eina positiva ávirkan á búskapin. Peningurin skal jú placerast uttanlands, og kann sostatt ikki av bankum og sparikassum lænast út til aktivitets- og nýtslufremjandi endamál.

Endaliga kemur peningurin at standa sum ein kontant áogn uttanlands, og kemur aftur her, nú beinleiðis; at minka um nettouttanlandsskuldina.

Fyriliggjandi uppskot kemur sostatt, sjálvt út frá sonu upphæddd sum minkingin í avgjøldunum, at hava nógv, nógv størri positiva ávirkan á búskaparligu gongdina, her íroknað nettouttanlandsskuldina.

Líkningarráð Føroya og Hagdeildin hava gjørt ávíst hagtalstilfar um skattingina av okkara borgarum. Roknað út frá hesum taltilfari fyri 1984 høvdu 38.915 borgarar eina skattskyldugа inntøku uppá ialt umleið 3.2 milliardir krónur. Her er renta ikki drigin frá.

Niðan fyri er víst ein uppstilling, sum vísir:

Talrøð 1. Uppbýti í inntøkubólkar upp til 500 kr.
Talrøð 2. Uppskot um bundna uppsparing hjá teimum ávísu inntøkubólkunum.

Talrøð 3. Meiriuppsparingin fyri viðkomandi inntøkubólk í %.
Talrøð 4. Tal av skattaborgarum innan hvønn inntøkubólk í 1984.

Talrøð 5. Samlað bundin uppsparing fyri hvønn inntøkubólkin og ialt fyri árið 1984.

Talrøð 6. Samlað skattskyldug inntøka fyri 1984.

Talrøð 7. Mettar minniútreiðslur hjá hvørjum einstøkum

skattaborgara, um oljuavgjaldið verður avtikið og cykainnflutningsgjaldið verður lækkað til 3 %.

Talrøð 8. Munurin er millum minniútreiðslur og bundna uppsparing.

Bundin uppsparing (að fyrsta árið, roknað út frá 1984 tølunum.

Sk. sk. Inntøka í meðal krónur	Herav bundin uppspar. krónur	% av muni upp til	Tal av skattgjaldar.	Bundin uppspar. falt kr 1000 kr.	Sk. sk. inntøka falt 1000 kr.	Sparing avtøkn avgjøld krónur	Munur Sparing/ Uppspar. krónur
2500	0	0	6774	0	16935	325	325
7500	0	0	1661	0	12458	625	625
15000	0	0	2644	0	39660	1425	1425
25000	0	0	2868	0	71700	2500	2500
35000	400	2	3123	1249	109305	3500	3100
45000	550	3	1695	932	76275	4400	3850
55000	950	4	1522	1446	83710	4800	3850
65000	1450	5	1501	2176	97565	5200	3750
75000	2050	6	1401	2872	105075	5300	3250
85000	2750	7	1322	3636	112370	5700	2950
95000	3450	7	1183	4081	112385	6500	3050
125000	5550	7	6121	33972	765125	7800	2250
175000	9050	7	3882	35132	679350	8500	-
225000	12550	7	1685	21147	379125	8800	-
275000	16050	7	683	10962	187825	9100	-
350000	21300	7	480	10224	168000	9300	-
500000	31800	7	370	11766	185000	9500	-
falt			**38915**	**139595**	**3201863**	---	---

Verður skattskylduga inntøkan økt við 10 % til 1985, 9 % til 1986 og við 5 % til 1987 fæst ein upphædd fyri 1987 uppá kr. **4030985**
Verður bundna uppsparingin 1984 økt tilsvarandi fæst kr. **175743**

Við inntøkubólkabýtingum fært ajour eftir hækkaðu inntøkuni er bundna uppsparingin 1987 væl hægri enn tær 175 milj. kr.

Niðanfyri er víst gongd í samlaðu bundnu uppsparingini, íroknað rentur uppá 10 %, hálv renta roknað í innsetingarárinum. Roknað er við 5 % hækkan árliga av bundnum peningi, og sum um skipanin byrjaði 1/1 1987.

Við árslok	1987	1988	1989	1990
Bundið í árinum	175743	184531	193757	203445
Renta til kontohavararnar	8787	31370	57740	88404
Vøkstur í árinum	184531	215901	251497	291849
Innistandandi við ársbyrjan	0	184531	400431	651928
Innistandandi við árslok, tkr.	184531	400431	651928	943777

Viðmerkjast skal, at býtið uppá inntøkubólkar stavar frá árinum 1984. Reglering er ikki gjørd fyri persónligar avskrivingar, mótroknaaðar í A-inntøkuni. Hesi bæði nevndu merkja eina hægri samlaða bundna uppsparing enn víst í talvuni. Hædd er ikki tikin fyri undantøkum viðv. loysan av bundnum peningi. Hetta merkir hin vegin eina minking av samlaðu uppsparingini.

Undir nevndarviðgerðini eigur at verða fingið til vega seinasta hagtalstilfarið.

Í uppskotinum eru ikki tiknir dagar ímillum forsyrgjarur og ikki forsyrgjarar, samskattað ella ikki samskattað, vaksin ella børn, foreldur við børnum ella uttan børn o.s.fr. Útrokningin er gjørd út frá persónum, sum hava eina skattskylduga inntøku uppá kr. 35.000,- (áðrenn persónligar avskrivingar í A-inntøku) ella meira.

Eru fleiri inntøkur í sama húsi, so koma hesar inntøkur hvør sær undir bundna uppsparing. Eftir okkara tykki er tað sokallaða skattligа rættvísiskravið ikki so tungtvigandi í hesum føri, tá peningurin jú framvegis verður ogn hjá skattaborgaranum, sum eisini fær rentuna av peninginum í bindingarskeiðnum.

Viðmerkjast kann eisini, at avtøkan av oljugjaldinum uppá 70 oyru liturin merkir einar 110 milj. kr. meira til borgaran, og minkingin í serliga innflutningsgjaldinum uppá 3 % merkir einar 70 milj. kr. Hetta gevur ein meðallætta uppá teir 38.913 skattaborgararnar uppá kr. 4.625 fyri hvønn. Meðallættin fyri hvørt húsarhald verður einar kr. 13.000 fyri hvørt.

Sum tað sæst á talvuni skal skattaskylduga inntøkan vera oman fyri kr. 150.000,- áðrenn bundna uppsparingin kemur uppum ta upphæddina, sum verður spard orsakað av avtøku av nýggju inntøkureglum landsstýrisins, og so er tann sera týdningarmikli munur, at borgarin framvegis eigur og fær rentu av hesum peningi. Hetta umframt, at ávirkanin á samfelagsbúskapin er størri og betri, enn um peningurin fór inn í landskassan fyri at verða nýttur har.

Sum longu nevnt frammanfyri, so er hetta lógaruppskot tengt saman við tveimum øðrum lógaruppskotum, sum verða framløgd saman við hesum. Annað er uppskotið um avtøku av serliga oljuavgjaldinum, og hitt er uppskotið um at lækka eykainnflutningsgjaldið úr 6 % niður í 3 %.

Verða tey bæði uppskotini ikki samtykt, so er grundarlagið hurtur undan hesum uppskotinum, sum í lí føri verður tikið aftur.

1. viðgerð 27. november. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 22: Avtøka av serligum gjaldi á brennioliu v.m. og 23: Lækkan av eykainnflutningsgjald

inum og vórðu tey øll beind í skattanevndina, sum 3. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av Sambandsflokkinum 1. oktober 1986 og varð eftir fyrstu viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Poul Jacob Olsen) tekur ikki undir við uppskoti Sambandsfloksins, tí vit vita um, at landsstýrið arbeiðir við einum líknandi uppskoti.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) vísir til álit sítt í tingmáli nr. 13/1986 og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 5. mars 1987. Uppskotið varð afturtikið.

25 Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Ár 1986, mikudagin 1. oktober legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar v.fl.

§ 1.

Í fíggjarárinum 1986 verður úr landskassanum veittur ein brennistudningur til pensjónistar við kr. 1.200 til hvønn pensjónist.

§ 2.

Brennistudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. oktober 1986 hava fingið játtað fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón ella hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensjónina játtaða.

lagtingslov om brændselstilskud til visse pensionister m.fl.

§ 1.

I finansåret 1986 ydes af landskassen et brændselstilskud til pensionister på kr. 1.200 til hver pensionist.

§ 2.

Brændselstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1986 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3.

Treytin fyri at fáa brennistuðning er, at pensjónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensjónina enn 70.000 kr. fyri hjún og 50.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensjónini pr. 1. oktober 1986. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

§ 4.

Í fíggjarárinum 1986 verður úr landskassanum eisini veittur ein brennistuðningur við kr. 1.200,- til fólk, sum fann 1. oktober 1986 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5.

Brennistuðningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldsstovu.

2. stk. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brennistuðninginum um hendi.

3. stk. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ 6.

Brennistuðningurin er ikki skattskyldugur.

§ 7.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 3.

Betingelsen for at få brændselstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt foruden pensionen end 70.000 kr. for ægtefæller og 50.000 for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. oktober 1986. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4.

I finansåret 1986 ydes af landskasen også et brændselstilskud på kr. 1.200,- til personer, der den 1. oktober 1986 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5.

Brændselstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldsstova.

Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændselstilskuddet.

Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ 6.

Brændselstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í fíggjarárinum 1980/81 var brennistuðningur veittur til ávísar pensjónistar við 900 kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1980 um brennistuðning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð brennistuðningur veittur til ávísar pensjónistar við 900 kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1980 um brennistuðning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð brennistuðningur veittur til ávísar pensjónistar

við 1.200 kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 26 frá 5. mai 1981 um brennistudning til ávisar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð sambært løgtingslóg nr. 76 frá 11. december 1981 um brennistudning til stakar uppihaldarar brennistudningur eisini veittur støkum uppihaldarum við egnum húsarhaldi, sum fingu hjálp sambært § 22 í forsorgarlógini.

Í fíggjarárinum 1982/83, 1983/84, 1984/85 og 1. april-31. december 1985 varð sambært løgtingslógunum nr. 79 frá 21. mai 1982, nr. 52 frá 20. mai 1983, nr. 63 frá 5. juni 1984 og nr. 3 frá 9. januar 1986 um brennistudning til ávisar pensjónistar og stakar uppihaldarar brennistudningur veittur við 1.200 kr. til hvønn í hvørjum fíggjarári.

Útreiðslurnar til brennistudningsskipanina vóru í fíggjarárinum.

1980/81	2.606.000 kr.-
1981/82	3.596.000 kr.-
1982/83	3.671.000 kr.-
1983/84	3.650.000 kr.-
1984/85	3.653.000 kr.-
1/4-31/12 1985	3.636.000 kr (fyribils tal).

Landsstýrið metir, at tørvur er á, at sami brennistudningur verður veittur ávísum pensjónistum og ávísum støkum uppihaldarum í fíggjarárinum 1986 eins og í undanfarnum árum

Í álíti frá 27. november 1985 í løgtingsmáli nr. 10/1985 gongur Almanna- og Heilsunevnd Løgtingsins inn fyri, at upphæddin, sum latin verður sum brennistudningur, verður hækkað úr 1.200 kr. í 1.500 kr. Landsstýrið metir, at fortreytin fyri at hækka brennistudningin er burtur, nú oljuprisurin er lækkaður, hóast gjald verður lagt á oljuna.

Eisini var í álitinum frá Almanna- og heilsunevndini mælt til, at § 3 verður endurskoðað.

Brennistudningurin hevur higartil verið latin, um viðkomandi hevur rætt til pensjónsviðbót. T.v.s. at í ár hevði inntøkumarkið verið 48.899 kr. fyri hjún og 32.099 fyri støk.

Landsstýrið metir, at hetta inntøkumark eigur at verða hækkað til 70.000 kr. fyri hjún og 50.000 kr. fyri støk, og gevur hetta leysliga mett eina meirútreiðslu upp á 480.000 kr.

1. viðgerð 28. oktober. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 29. oktober legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 1. oktober 1986.

Aftan á 1. viðgerð hin 28. oktober varð málið beint í almanna- og heilsunevndina.

Uppskotið um brennistudning til ávisar pensjónistar v.fl. er í stórum hitt sama, ið er komið á hvørjum ári síðan mai 1980. Treytin fyri at fáa brennistudning hevur higartil verið, um viðkomandi hevur rætt til pensjónsviðbót, t.v.s. har inntøkumarkið hevur verið kr. 48.899,- (fyri hjún) og kr. 32.099,- (fyri støk) árliga.

Í uppskotinum mælir landsstýrið til, at hetta mark verður flutt, soleiðis at fyri hjún verður talið kr. 70.000,- árliga og fyri støk kr. 50.000 árliga.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov, Jógvan Sundstein og Tordur Nielsen) tekur undir við hesi broyting, men samstundis er nevndin samd um, at treytin, sum varð gjørd í 1980, og sum hevur virkað øll hesi árini, nevniliga at pensjónisturin fekk pensjónsviðbót, var einfald og løtt at umsita. Nevndin hevur tí í hyggju at kanna hvussu spurning umaltur, eftir at brennistudningurin nú verður goldin eftir øðrum reglum.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) visir á, at eingin ivi er um, at tað er vorðið dýrari at búgva í Føroyum seinastu 2 árini, og metir tað neyðugt at hækka brennistudningin í §§ 1 og 4 frá 1.200 kr. til 1.500 kr., og setir samsvarandi hesum til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi:

broytingaruppskot

1. Í § 1 verður upphæddin »kr. 1.200,-« broytt til: »kr. 1.500,-«.

1. I § 1 ændres beløbet »kr. 1.200,-« til: »kr. 1.500,-«.

2. Í § 4 verður upphæddin »kr. 1.200,-« broytt til: »kr. 1.500,-«.

2. I § 4 ændres beløbet »kr. 1.200,-« til: »kr. 1.500,-«.

Inntøkulógirnar hava ført við sær, at hesi fólkini, sum hava brennistudning fyri neyðini, eru harðast rakt.

Hetta hendir samstundis, sum fíggjarmálaráðharrin í øðrum sambandi hevur sagt, at ongantíð fyrr hevur verið mett um eitt so stórt avlop hjá landskassanum sum í verandi fíggjarári.

Uppskotið hevur við sær eina meiriútreiðslu fyri landskassan upp á umr. kr. 900.000. Upphæddin átti at verið større, men henda litla hækkingin kundi havt ein møguleika fyri at verið samtykt av løgtinginum.

Tí verður hildið, at nevnda meiriútreiðsla verður fíggjað yvir landskassans part av avlopinum.

2. viðgerð 4. november. Broytingaruppskot minnilutans fall við 8-0. § 1 varð samtykt við 25-0. §§ 2-7 samtyktar við 25-0. At málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt við 25-9.

3. viðgerð 6. november. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-20-1. Lóg nr. 119 frá 25. nov. 1986.

26. Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

Ár 1986, mikudagin 29. oktober legði løgtingsformaðurin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 1976, sum broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 7. juni 1979 og løgtingslóg nr. 67 frá 7. juni 1984 um samsýning løgtingsmanna verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, 3. stk. verður orðað soleiðis:
Løgtingsformaðurin, 1. og 2. tingskrivari og formenninir í fíggjarnevndini, marknaðarnevndini og fiskivinnunevndini fáa eina eyka samsýning uppá 15.000 kr. árliga. Um løgtingsmaður rekur fleiri av hesum størvum, fær hann tó bert eykasamsýning fyri eitt starv.«

2) § 5 verður orðað soleiðis:
»Varamaður fyri løgtingsmann fær samsýning frá tí degi, hann hevur fingið tingsins góðkenning, ella um hann tekur við seinri so frá hesum degi, til hann fer frá, ella tá løgtingssetan endar, ella steðgur verður í løgtingsarbeiðinum minst 14 dagar.
2. stk. Samsýning er kr. 225 um dagin, leygardagar, sunnudagar og aðrar halgidagar undan tiknir, uttan so at tingið er saman hesar dagar. Tíma

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til lagtingsmænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 51 af 9. maj 1976, som ændret med lagtingslov nr. 50 af 7. juni 1979 og lagtingslov nr. 67 af 7. juni 1985 om vederlag til lagtingsmænd foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 3 affattes således:
»Der tillægges lagtingsformanden, 1. og 2. tingsekretær, formændene for finansudvalget, markedsudvalget og fiskeriudvalget et ekstra vederlag på 15.000 kr. årlig. Beklæder lagtingsmand flere af disse hverv får han kun vederlag for et af hververne.«

2) § 5 affattes således:
»Udbetales suppleant for en lagtingsmand vederlag fra den dag, han har modtaget lagtingets godkendelse, eller når han tiltræder på et tidspunkt så fra denne dag, til den dag han fratræder, eller til lagtingssamlingen afsluttes eller lagtingsarbejdet holder op i mindst 14 dage.
Stk. 2. Vederlaget er kr. 225 pr. dag, dog ikke for lørdage, søndage og helligdage, såfremt tinget ikke er samlet disse dage. Time- og dag-

og dagpening fær hann eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri tænastumenn.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó hvat viðvíkir ásetanini av samsýning til 2. skrivara, fær lógin gildi frá 8. november 1984.

penge udbetales efter samme regler, som gælder for landets tjenestemænd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse, dog vedrørende ansættelsen af løn til 2. tingsekretær træder loven i kraft fra 8. november 1984.

1. viðgerð 4. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina og ikki afturkomið haðani.

27. Fiskiloyvi til Háborg.

Ár 1986, mikudagin 1. oktober løgtdu løgtingsmenninir Svend Aage Ellefsen og Óli Breckmann fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt at útvega Háborg fiskiloyvi til ókvoterað fiskasløg fyribils í 6 mánaðir, samstundis sum Krúnborg og Norðborg sleppa at fiska víðari eftir galdandi skipan, til bóskandi søluprísur fæst fyri annað teirra.

Viðmerkingar:

Uppskotið er í tráð við Fólkafloksins støðu undir fíggjarnevndarviðgerð um veðhald til Háborg. Tá mælti flokkurin til, at landsstýrið fellur frá kravinum um, at eitt líknandi skip treytaleyst verður selt ella lagt úr flotanum fyri í Háborg.

Fólkaflokkurin visti á tað rætta og rimiliga í, at nýggja skipið fær loyvi at veiða ókvoterað fiskasløg, t.d. svartkjaft og ta lodnu, sum keypast kann frá grønlendingum.

Háborg hevur nú ligið við bryggju í tveir mánaðir fyri 30.000 kr. um dagin ella alt 2 mió. kr. í útreiðslum.

Við eini mettari veiðinøgd, sum árliga svarar til 40 mió. kr. í landaðum virði,

merkja tveir mánaðir, at skip og manning hava mist ialt 5-6 mió. kr. í inntøku.

Landsskaði er tað, at teir 30 menninir og familjur teirra, sum kundu fingið áss inntøkuna, ialt 10-15 mió. kr. í hýrum, ganga fyri einki og bíða í óvissu, meðan ófiskaður svartkjaftur fær loyvi at svimja, ti veiðifør okkara liggja bundin við kai av politiskum ósmidleika.

Føroyingar hava fyri neyðini at veiða størst møguligt tonsatal av svartkjafti at brúka sum samráðingargrundarlag, tá TAC verður ásett fyri svartkjaft, og kundi Háborg verið eitt nýtiligt amboð í hesi styrking av samráðingarstøðu okkara.

Tað er harnæst ódamannaverk at tvinga eitt útgerðarfelag til at forera eitt skip sum Krúnborg ella Norðborg burtur, eins og tað er páset ligt at noyða felagið at leggja slíkar fløðandi inntøkukeldur fyri búskap okkara óvirknaðar við kai.

Fyrrenn boð millum 30 og 40 mió. kr. eru felagnum í hendi fyri hvørt ella annað av Norðborg/Krúnborg, eiga tey ikki at verða seld.

Hetta landsstýrið hevur hóast alt víst seg liðiligt, tá umráddi at ganga frá einum upprunaligum kravi um útskifti av skipi fyri skip, t.d. tá umstøðurnar talaðu fyri eini støðubroyting í Tinganesi í spurninginum um innflutningsloyvi hjá Tvøroyrar Trolarafelag og Chlamys.

Tað sama má vera galdandi í førinum Háborg/Krúnborg (Norðborg), nú so nógv talar fyri, føroyska búskapinum tørvar øll trý skipini, og mint verður á, at hetta uppskot gildir fyribils í seks mánaðir. Til várs kunnu nýggir útvegir liggja opnir, sum gera, at Føroya fólk verður landsstýrinum takksamt fyri, at samgongan verður við til at samtykkja hetta uppskot.

1. viðgerð 27. november, og varð málið afturtikið.

28. Løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum.

Ár 1986, mikudagin 29. oktober legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi.

Uppskot

til

Løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbasjúkum.

§ 1.

Landsstýrið ásetir í kunngerð, hvørjar sjúkur lógin fevnir um.

Lagtingslov om sygdomme hos fisk, skaldyr og krebsdyr.

§ 1.

Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse, hvilke sygdomme loven omfatter

§ 1.

Landsstýrið ásetir í kunngerð, hvørjar sjúkur lógin fevnir um.

2. stk. Lógin fevnir um fisk (pisces), skeljadýr (molluscae) og krabbadýr (crustaceae).

§ 2.

Eigarar av alifiski, skeljadýrum og krabbadýrum og aðrir, sum starvast hjá eigara, hava skyldu til beinanvegin at siga landsdjóralæknanum frá, um teir gruna, at fiskur, skeljadýr og krabbadýr eru fongd við ella eru deyð av sjúku.

2. stk. Somuleiðis hevur tann, ið av fyrisettum ráði verður varugur við villan fisk, skeljadýr ella krabbadýr, ið eru fongd við ella eru deyð av sjúku, skyldu beinanvegin at siga landsdjóralæknanum frá.

§ 3.

Ikki er loyvt at selja, geva burtur, keypa, taka ímóti ella at seta út livandi fisk, skeljadýr og krabbadýr ella livandi rogn av fiski, um illgruni er um, at fiskur, skeljadýr og krabbadýr ella rogn av hesum er fongd við sjúku.

2. stk. Landsdjóralæknin kann í serligum føri geva undantaksloyvi frá reglunum í 1. og 2. stk., og kann seta treytir í loyvinum.

§ 4.

Ikki er loyvt at innflyta livandi fisk, skeljadýr, krabbadýr ella yngul og rogn av hesum.

2. stk. Ikki er loyvt at innflyta feskun ella saltaðan fisk, skeljadýr ella krabbadýr.

§ 1.

Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse, hvilke sygdomme loven omfatter.

Stk. 2. Loven omfatter fisk (pisces), skaldyr (molluscae) og krebsdyr (crustaceae).

§ 2.

Ejere af opdrætsfisk, skaldyr, krebsdyr og andre, som er ansat hos ejer, har pligt til straks at underrette landsdyrlægen, hvis har mistanke om, at fiskene, skaldyrene eller krebsdyrene er befængt med eller døde af sygdom.

Stk. 2. På samme måde har den, som med fortsæt bemærker, at vild fisk, skaldyr eller krebsdyr, er befængt med sygdom, pligt til straks at udrette landsdyrlægen.

§ 3.

Det er ikke tilladt at sælge, give bort, købe, tage imod eller udsætte levende fisk, skaldyr eller krebsdyr, såfremt det må befrygtes, at fisken, skaldyrene eller krebsdyrene eller rogn af disse er befængt med sygdom.

Stk. 2. Landsdyrlægen kan i særlige tilfælde give dispensation fra reglerne i stk. 1 og 2, og kan fastsætte vilkår i tilladelsen.

§ 4.

Det er ikke tilladt at indføre levende fisk, skaldyr, krebsdyr eller yngel og rogn af disse.

Stk. 2. Det er ikke tilladt at indføre fersk eller saltet fisk, skaldyr eller krebsdyr.

3. stk. Landsdjóralæknin kann í serligum føri gevu undantaksloyvi frá reglunum í 1. stk., og kann seta treytir í loyvinum.

§ 5.

Ikki er loyvt at flyta innbrúkta aliútgerð og aðrar vørur og lutir til alivinnuna, ið kunnu bera við sær smittu.

2. stk. Brúkt fiskiveiðuamboð kunnu bert verða innflutt, um tey eru sóttreinsað eftir reglum ásettum av landsstýrinum.

3. stk. Landsstýrið kann seta í gildi reglur viðvíkjandi flutningi oyggjanna millum fyri at tálma, at sjúka bjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum spjaðir seg út um landið.

4. stk. Landsstýrið kann avgera ella seta í gildi reglur um at áleggja innflytara at gjalda útreiðslur, ið standast av kanningum, ið eru neyðugar fyri at hava eftirlit við tí í 1. — 3. stk. nevndu viðurskiftum og kann krevja kostnaðin inn við útpanting.

§ 6.

Landsdjóralæknin kann gera av, at fiskur, yngul, rogn, vørur ella lutir, ið eru innfluttir ella sum roynt hevur verið at innflyta ímóti reglum við hei mild í §§ 4 og 5, kunnu sendast aftur av landinum ella at beint verður fyri teimum, fyri rokning innflytarans, hóast tað at fiskurin, skeljadýr og krabbadýr, rognið, yngulin, vøran ella luturin er ogn hjá øðrum.

§ 7.

Landsdjóralæknin kann krevja, at tiltøk verða sett í verk, eisini at fiskur, skeljadýr ella krabbadýr verða avlívað,

Stk. 3. Landsdyrlægen kan i særlige tilfælde give dispensation fra reglen i stk. 1, og kan fastsætte vilkår i tilladelsen.

§ 5.

Der er ikke tilladt at indføre brugt opdrætsudstyr og andre varer og dele til opdrætserhvervet, som kan medføre smitte.

Stk. 2. Brugt fiskeudstyr må kun indføres, såfremt det er desinficeret efter regler udstedt af landsstyret.

Stk. 3. Landsstyret kan sætte regler vedrørende transport øerne imellem i kraft for at hindre, at sygdomme hos fisk, skaldyr og krebsdyr spredes ud over landet.

Stk. 4. Landsstyret kan afgøre eller sætte regler i kraft om at pålægge importøren at betale udgifter, der påføres ved undersøgelser, som er nødvendige for at udøve tilsyn med de i stk. 1. — 3. nævnte forhold, og kan opkræve udgifterne betalt gennem udpantning.

§ 6.

Landsdyrlægen kan bestemme, at fisk, skaldyr eller krebsdyr, yngel, rogn, varer eller dele, der er indført eller forsøgt indført i strid meg reglerne i §§ 4 og 5, kan tilbagesendes eller destrueres for importørens regning, uagtet at fisken, skaldyrene, krebsdyrene, rognene, yngelen, varen eller tingene er andres ejendom.

§ 7.

Landsdyrlægen kan kræve, at foranstaltninger iværksættes, herunder at fisk, skaldyr eller krebsdyr aflives

um tað verður hildið neyðugt fyri at fyrihyrgja, avmarka ella beina fyri teimum sjúkum, sum lógin fevnir um. Áðrenn landsdjóralæknin kann geva boð um at avlíva fisk, krevur hetta tó góðkenning frá landsstýrinum.

2. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um tey í stk. 1. nevndu tiltøk.

3. stk. Verður fiskur, skeljadýr ella krabbadýr avlívað eftir boðum landsdjóralæknans, kann endurgjald verða veitt úr trygdargrunni alivinnunnar, tó bert í tann mun, tryggingin ikki tekur við.

4. stk. Endurgjaldið verður ásett av trimum metingarmonnum, harav tveir verða tilnevndir av landsstýrinum eftir tilmælir frá Aliráðnum og ein av Havbúnaðarfelagnum. Trygdargrunnur alivinnunar ber útreiðslurnar av virðismetingini.

5. stk. Virðið á fiskinum, skeljadýrunum ella krabbadýrunum verður at áseta eftir marknaðarvirðinum, sum fiskurin, skeljadýrið ella krabbadýrið hevur, tá ið avlívað verður, tó soleiðis at tað verður sæð burtur frá tí sjúkuni, ið hevur verið atvoldin til avtøkuna. Av hesari upphædd fer møguligt søluvirði á tí avlívaða fiskinum og spardum útreiðslum.

6. stk. Eigarar av fiski, skeljadýrum og krabbadýrum, ið sjálvir hava verið atvoldin til, at fiskur er smittaður ella sjúkur, fáa ikki endurgjald frá trygdargrunni alivinnumnar.

7. stk. Um eigari ella annar, sum hevur ábyrgdina av alistøð o.t., ikki ger eftir boðum givnum sambært lógini ella givnum sambært reglum ásettum við heimild í lógini, kann landsstýrið seta tiltøkini í verk fyri rokning hansara

såfremt det vurderes at være nødvendigt at forebygge, begrænse eller udrydde sygdomme, som loven omfatter. Før landsdyrlægen kan give påbud om at fisk, skaldyr eller krebsdyr afliv es, kræves godkendelse fra landsstyret.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelse om de i stk. 1. nævnte foranstaltninger.

Stk. 3. Såfremt fisk, skaldyr eller krebsdyr aflives efter påbud fra landsdyrlægen, kan erstatning betales af fiskeopdrætserhvervets garantifond, dog kun forsikringen ikke dækker.

Stk. 4. Erstatningen fastsættes af tre vurderingsmænd, hvoraf to udnævnes af landsstyret efter indstilling fra »Aliráðið« og en af »Havbúnaðarfelagið«. Fiskeopdrætserhvervets garanti fond afholder udgifterne af vurderingen.

Stk. 5. Fiskens, skaldyrets eller krebsdyrets værdi fastsættes efter markedsværdien, som fisken, skaldyret eller krebsdyret har, når den aflives, dog således, at der borset fra den sygdom, som har været grunden til slagtningen. Av dette beløb fragår mulig salgsværdi af den avlivede fisk, skaldyr eller krebsdyr samt sparede omkostninger.

Stk. 6. Ejer af fisk, skaldyr og krebsdyr, der selv har forvoldt, at fisk er blevet smittet eller syg, får ikke erstatning fra fiskeopdrætserhvervets garantifond.

Stk. 7. Såfremt en ejer eller anden, der har ansvaret for en opdrætsstation e.l., ikke efterkommer påbud givet i henhold til loven eller givet i henhold til regler fastsat med hjemmel i loven, kan landsstyret iværksætte de nødvendige foranstaltninger for hans

og krevja kostnaðin inn við útpanting.

§ 8.

Stovnsettur verður Trygdargrunnur alivinnunar, sum skal veita endurgjald fyri tiltøk framd við heimild í § 7. *2. stk.* Grunnurin virkar samsvarandi reglum gjørdum av Havbúnaðarfelagnum og góðkendum av landsstýrinum.
3. stk. Figgjarliga grundarlag grunsins er gjald frá alarum og árlig játtan á løgtingsfíggjarlógini.

§ 9.

Landsdjóralæknin ella annar, sum landsdjóralæknin hevur givið fulltrú, hevur við neyðugari lógarváttan og uttan rættarúrskurð atgongd til húsrúm, øki og støðir, har sjúkur, sum lógin fevnir um, kunnu koma fyri, at har fáa høvi at gera neyðugar kanningar.

§ 10.

Avgerðir landsdjóralæknans eftir lógarinnar §§ 4, 2. stk., 6, og 7. ella ávísandi til reglur við heimild í lógini kunnu verða skotin inn fyri landsstýrið. Avgerð um at avlíva sambært § 7, stk. 1., kann ikki kærast til landsstýrið.
2. stk. Málið verður at senda til landsdjóralæknan, sum við sínum omnæli og tilfari, sum er brúkt í málinum, sendir landsstýrinum hana.
3. stk. Freistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er fráboðað avvarðandi, tó 24 tímar í teim í §§ 6 og 7, 1. stk. nevndu førum.

regning og kræve beløbet ind gennem udpantning.

§ 8.

Der oprettes en Fiskeopdrætserhvervets garantifond, som skal yde erstatning for foranstaltninger foretaget med hjemmel i § 7.
Stk. 2. Fonden virker i hendhold til regler udfærdigede af »Havbúnaðarfelagið« og godkendt af landsstyret.
Stk. 3. Fondens finansielle grundlag er bidrag fra opdretterne og en årlig bevilling på lagtingsfinansloven.

§ 9.

Landsdyrlægen eller anden person, som landsdyrlægen har udstyret med fuldmagt, har mod behøring legimation og uden retskendelse adgang til lokaler, områder og stationer, hvor sygdomme, som loven omfatter, kan forekomme og der foretage nødvendige undersøgelser.

§ 10.

Landsdyrlægens afgørelser i h.t. lovens §§ 4, 2. stk., 6, og 7 eller i h.t. til regler med hjemmel i loven kan ankes til landsstyret. Afgørelse om at aflive i h.t. § 7, stk. 1., kan ikke påklages til landsstyret.
Stk. 2. Anken sendes til landsdyrlægen, som derefter med sin udtalelse og det materiale, som er brugt i sagen, sender den til landsstyret.
Stk. 3. Ankefristen er 4 uger fra den dag, afgørelsen er meddelt den pågældende, dog 24 timer i de i §§ 6 og 7, stk. 1, nævnte tilfælde.

4. stk. Landsdjóralæknans avgerð kann verða skotin inn fyri landsstýrið:
1) tí, til hvønn avgerðin er veend,
2) einum og hvørjum, sum haldast má at hava serstaka týdningarmiklan áhuga í úrslitinum av málinum.

5. stk. Tað, at málið verður skotið inn fyri hægri rætt, virkar ikki tálmandi á avgerðir landsdjóralæknans. Landsstýrið kann tó gera av, at innskjótingin fyri landsstýrið skal tálma avgerðini.

§ 11.

Um ikki størri revsing er uppiborin eftir aðrari lóg, kann tann verða sektaður, sum
1) ger brot á §§ 3, 4, 1. og 2. stk. og § 5,
2) letur vera við at lýða boð ella eina upplýsingarskyldu § 2, stk. 1 og 2 og § 7 eftir reglum ásettum við heimild í lógini.
3) setir tilsíðist treytir, sum eru ásettar í loyvi ella góðkenning ávísandi til lógarinnar §§ 3, 2. stk., 4, 3. stk., ella ávísandi til reglur fyriskipaðar við heimild í lógini.

2. stk. Brot kann ásetast sum revsing fyri brot á reglur, sum ásettar eru við heimild í lógarinnar § 5, 2. og 3. stk.

3. stk. Fyri brot, sum gjørd eru av partafeløgum, smápartafeløgum, lutafeløgum o.t. kann felagnum sum slíkum verða áløgd bótarskylda. Er brotið gjørt av kommunum ella kommunalum felagsskapi, kann bótarskyldan verða løgd á kommununa ella kommunala felagsskapin.

§ 12.

Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

2. stk. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg

Stk. 4. Landsdyrlægens afgørelse kan ankes af:
1) den, til hvem afgørelsen er rettet,
2) enhver, som må menes at have en særlig vægtig interesse i sagens afgørelse.

Stk. 5. Anke virker ikke opsættende på landsdyrlægens afgørelse. Landsstyret kan dog bestemme, at anken skal have opsættende virkning.

§ 11.

Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der:
1) overtræder §§ 3, 4, stk. 1 og 2 og § 5,
2) undlader at efterkomme et påbud eller en oplysningspligt efter § 2, stk. 1 og 2 og § 7 eller i h.t. reglen fastsat med hjemmel i loven.
3) tilsidesætter vilkår, som er fastsat i tilladelse eller godkendelse i h.t. §§ 3, stk. 2, 4, stk. 3 eller i h.t. regler udstedt i medfør af loven.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af lovens § 5, stk. 2 og 3 kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

Stk. 3. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, anpartsselskaber, andelskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar. Er overtrædelsen begået af en kommune eller et kommunalt fællesskab, kan bøden pålægges kommunen eller det kommunale fællesskab.

§ 12.

Loven træder i kraft dagen efter kundgørelsen.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov

lóg nr. 46 frá 23. juni 1970 um forboð móti innflutningi av livandi sílum og laksi sum broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 2. august 1985.

nr. 46 af 23. juni 1970 om forbud mod indførsel af levende ørred og laks, som ændret ved lagtingslov nr. 61 fra 2. august 1985.

Viðmerkingar:

Eftir at Pf Fiskaaling í eini 10 ár hevði gjørt ymiskar royndir við aling, fóru tær fyrstu privatu fyritøkurnar undir aling á sjónum seinast í sjeytiárunum. Seinni kom rættiligg gongd á hesa vinnu, og í dag er talan um sera umfatandi aling, serliga á nøkrum ávísum plássum. Tættleikin, sum talan er eru, økir sum kunnugt um vandan fyri sjúkum.

Til fyri umleið hálvum ári síðani var eingin sjúka staðfest í føroyskum alifiski. Síðani eru ikki færri enn fimm sjúkur staðfestar. Hesar eru: IPN, hitrasjúkan, vibriose, costriasis og forunkulosa. Henda seinasta er sera vandamikil. Tá hon varð staðfest í juni í ár, tók landsstýrið ta støðu at heita á alarar um at avlíva all an fisk, ar illgruni um hesa sjúku var, til staðar. Hetta varð gjørt, og alt bendir á, at royndin at basa sjúkuni hevur eydnast.

Í samgonguskjalinum settu, vit okkum fyri at gera lóg um aling og havbúnað og at verja aliumhvørvið við lóggávu. Hetta er ikki løtuverk. Talan er um eitt sera umfatandi arbeiði og um rættiliga umfatandi kanningar m.a. av viðurskiftunum í okkara grannalondum. Út frá hesum gjørdi landsstýrið av fyribils at broyta galdandi lóg um forboð fyri innflutningi av livandi sílum og laksi, soleiðis at forboðið kom at galda allan livandi fisk, rogn og skeljadýr. Hetta varð gjørt á ólavsøku 1985.

Nú hava vit so uppskotið til løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum. Tað, at furunkolosa varð staðfest í juni og førdi til, at eini 200.000 smolt vórðu avlívað, hevur fingið ta ávirkan á lógarsmiðið, at uppskotið nú eisini umfatar Trygdargrunn alivinnunnar. Ætlanin er, at hesin grunnur í ávísan mun skal veita endurgjald, tá fiskur verður avlívaður eftir boðum frá landsstýrinum. Grunnurin skal fáa sínar inntøkur við gjaldi frá vinnuni og við árligari játtan á figgjarløgtingslógini. Nærri reglur verða ásettar um virksemið hjá grunninum. Hesar reglur verða gjørdar av Havbúnaðarfelagnum og góðkendar av landsstýrinum.

Figgjarligar avleiðingar

Ringt er í krónum og oyrum at siga, hvat fyriliggjandi lógaruppskot førir við sær av øktum útreiðslum, tí nærum ómøguligt er at meta um møguligt endurgjald orsakað av sjúkutilburðum.

Tó kann sigast við vissu, at útinnan av teimum heimildum og skyldum, ið sambært uppskotinum verða álagdar landsmyndugleikunum, og her verður serliga hugsað um landsdjóralæknaembætið og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna (sum laboratoriistovnur), fer at krevja, at løgtingið á figgjarlógini setir av neyðugan pening til setan av kønum fólki og til keyp av amboðum.

Galdandi lóggáva.
Galdandi reglur um veterinerviðurskifti fiski viðvíkjandi eru at finna í løgtingslóg nr. 46 frá 23 juni 1970 um forboð móti innflutningi av livandi síli og laksi sum broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 2. august 1985 og í løgtingslóg nr. 57 frá 24. mai 1974 um bygging, innrætting, nýskipan og viðkun av virkum til kleking av rognum og til fiskaaling sum broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 2. august 1985.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:
Til § 1: Samstundis sið lógini verður kunngjørt kunngerð, ið er listin yvir tær sjúkurnar, sum lógin til eina og hvørja tíð fevnir um.

Pisces er tað, sum vanliga verður nevnt fiskur, molluca er tað, sum vanliga er nevnt skeljadjór, og er crustacea vanliga nevnd krabbafiskur.
Til § 2: Tann í greinini álagda skylda er mett at vera týðandi táttur í tí fyribyrgjandi arbeiðnum. Í stk. 1 er kravið fyri revsing, at brotið er framt av ósketni, meðan í stk. 2 er kravið, at brotið er framt av fyrisettum ráði.
Til § 3: Mett verður, at »totalbann« er neyðugt, men tó soleiðis at landsdjóralæknin eftir umstøðunum kann geva undantaksloyvi, tá ið hetta verður hildið at vera ráðiligt.
Til § 4: Orðingin er meilík núverandi lóggávu, tó soleiðis at undantaksheimildin er løgd til landsdjóralæknan.
Til § 5: Samskiftið við øðrum alitjóðum — serliga Noreg — har nógvar sjúkur eru, sum vit ikki enn hava, ger tað neyðugt við slíkum fyribyrgjandi tiltøkum.
Til § 6: Løgreglan og tollvaldið eiga at vera landsdjóralæknanum til hjálpar í hesum arbeiði.
Til § 7, 1. stk.: Hildið verður, at neyðugt er at geva landsdjóralæknanum rættiligar víðar heimildir, um heilsustøðan hjá alifiski skal kunna varðveitast ella bøtast.

Góðkenning landsstýrisins í sambandi við avlíving verður mett at vera bæði rímulig er neyðug, tí fíggjarligu avleiðingarnar av slíkum tiltaki kunnu koma at vera álvarsligar bæði fyri vinnu og landskassan.

Ásetanin kann eisini nýtast av landsdjóralæknanum at skipa fyri felags avlíving.
Til § 7, 3. stk.: Trygdargrunnur verður settur á stovn sambært § 8, og kemur hann at fíggja endurgjald til alarar fyri avlívaðan alifisk. Við lógarinnar orð er meint, at grunnurin bert skal gjalda í teimum førum, har tryggingin sambært polisutreytunum ikki tekur við — tó soleiðis, at grunnurin ikki skal gjalda tað, ið svarar til sjálvsábyrgd alarans.

Um alari ikki hevur tryggjað fiskin, fær hann ikki endurgjald úr grunninum fyri tann partin av virðinum á fiskinum, ið hann eftir van-

ligum tryggingartreytum skuldi verið roknað sum sjálvsábyrgd.
Til § 8: Mett hevur verið, at rimiligt var, at bæði vinnan og landið átóku sær fíggjarligar skyldur og byrðar, og verður býtið av skyldum og byrðum at fastseta í reglugerð, ið landsstýrið skal góðkenna.

Nevnast kann, at ymiskt er í okkara grannalondum, hvussu reglurnar fyri endurgjaldi eru. Í Danmark rindar staturin einsamallur endurgjald fyri virðið á tí avlívaða fiskinum, og í Noreg verður einki latið frá statinum. Fyriliggjandi uppskot hevur sostatt valt eina meira solidariska millumloysn.
Til § 9: Heimildin eigur ikki at verða nýtt, fyrr enn allir aðrir møguleikar eru brúktir. Løgreglan er um neyðugt landsdjóralæknanum til hjálpar.
Til § 10: Landsdjóralæknaembætið er stovnur undir landsstýrinum og hevði tí verið rímiligt, at avgerðirnar sum í øllum øðrum førum kunnu leggjast fyri landsstýrið.

1. viðgerð 6. november. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 29. oktober 1986 og undir 1. viðgerð tann 6. november sama ár beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur hildið fund við umboð fyri Havbúnaðarfelagið. Aftaná fundin við Havbúnaðarfelagið er nevndin komin til ta niðurstøðu, at neyðugt er at gera ávísar broytingar til uppskot landstýrisins. Eisini er neyðugt í ávísum førum at gera ávísar tekniskar lógarbroytingar ella rættingar.

Ein samd nevnd mælir til, at í § 4 verður stk. 2, ið ljóðar soleiðis: »Ikki loyvt at innflyta feskan ella saltaðan fisk, skeljadýr ella krabbadýr« strikað. Í § 5 verður í 2. stk. viðvíkjandi fiskiveiðuamboðum tilskilað, at hetta skulu vera fiskiveiðuamboð til alivinnuna.

Í § 7 verður »trygdargrunnur alivinnunar« broyttur til »endurgjaldsgrunn«, og í § 7, stk. 6, verður í ordingini lagt afturat, at reglan eisini umfatar tað, ið gjørt verður av gáloysni.

Í § 8 verður ásett, at endurgjaldsgrunnurin virkar samsvarandi reglum, ið fyrisettum verða av landsstýrinum, og at tað fíggjarliga grundarlagið er játtan á fíggjarløgtingslógini.

Samsvarandi hesum setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

2) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis: »Somuleiðis hevur tann, ið hevur av óvart verið varugur við villan fisk, skeljadýr ella krabbadýr, ið eru fongd við ella eru deyð av sjúku, skyldu beinanvegin at siga landsdjóralæknanum frá.«
3) Í § 4 verður stk. 2 strikað, og stk. 3 verður stk. 2.
4) § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis: »Brúkt fiskiveiðuamboð til aktivinnuna sambært stk. 1 kunnu bert verða innflutt, um tey eru sáttreinsað eftir relum ásettum av landsstýrinum.«
5) § 7, stk. 3 verður orðað soleiðis: »Verður fiskur, skeljadýr ella krabbadýr avlívað eftir boðum landsdjóralæknans, kann endurgjald verða veitt úr endurgjaldstrygdargrunninum.
6) Í § 7, stk. 4 verða orðini: »Trygdargrunnur aktivinnunnar« broytt til: »Endurgjaldsgrunnurin«.
7) § 7. stk. 6 verður orðað soleiðis: »Eigarar av fiski, skeljadýrum og krabbadýrum, ið av gáloysni hava verið atvoldin til, at fiskur er smittaður ella sjúkur, fáa ikki endurgjald frá endurgjaldsgrunninum.
8) § 8 verður orðað soleiðis: »Stovnsettur verður endurgjaldsgrunnur, sum skal veita endurgjald fyri til-

1) I § 2, stk. 1 ændres ordene »hvis har mistanke om« til: »hvis du har mistanke om«.
2. § 2. stk. 2 formuleres således: »På samme måde har den, som bemærker, at vild fisk, skaldyr eller krebsdyr, er befængt med sygdom, eller døde af sygdom, pligt til straks at underrette landsdyrlægen herom.«
3) I § 4 udgår stk. 2, og stk. 3 bliver stk. 2.
4) § 5, stk. 2 affattes således: »Brugt fiskeudstyr til fiskeopdræt i henhold til stk. 1 må kun indføres, såfremt det er desinficeret efter regler udstedt af landsstyret.«
5) § 7. stk. 3 formuleres således: »Såfremt fisk, skaldyr eller krebsdyr aflives efter påbud fra landsdyrlægen, kan erstatning ydes af erstatningsfonden.
6) I § 7, stk. 4, ændres »Fiskeriopdrætserhvervets garantifond« til »Erstatningsfonden«.
7) § 7, stk. 6 formuleres således: »Ejere af fisk, skaldyr og krebsdyr, der ved grov uagtsomhed har forvoldt, at fisk er blevet smittet eller syg, får ikke erstatning fra erstatningsfonden.«
8) § 8. formuleres således: »Der oprettes en erstatsfond for fiskeriet, der skal yde erstatning for foranstaltninger, foretaget med hjemmel i § 7. *Stk. 2.* Fonden virker i henhold til regler, der er udfærdiget af landsstyr[illegible]

løk, framd við heimild í § 7.

2. stk. Grunnurin virkar samsvarandi reglum gjørdum av landsstýrinum.

3. stk. Fíggjarliga grundarlag grundsins er játtan á fíggjarlagtingslógini.«

9) Í § 10 verður »4, 2. stk.« strikað.

10) Í § 10, 4. stk. verður 1. punktum orðað soleiðis: »Landsdjóralæknans avgerð kann verða skotin inn fyri landsstýrið av:«

11) Í § 11 verður undir pkt. 1, orðingin »og 2.« strikað.

12) Í § 11, verður pkt. 3 soljóðandi: »setir tilsíðis treytir, sum eru ásettar í loyvi ella góðkenning ávísandi til lógarinnar §§ 3, 2. stk., 4. 2. stk. ella ávísandi til reglur fyriskipaðar við heimild í lógini.«

Stk. 3. Fondens finansielle grundlag er bevilling på lagtingsfinansloven.«

9) I § 10 udgår »4, 2. stk.«.

10) I § 10, stk. 4 formuleres 1. punktum således »landsdyrlægens afgørelse kan ankes til landsstyret af:«

11) I § 11, pkt. 1, udgår formuleringen »og 2«.

12) I § 11, formuleres pkt. 3 således: »tilsidesætter vilkår, som er fastsat i tilladelse eller godkendelse i henhold til §§ 3, stk. 2, 4, 2. stk. eller i henhold til regler udstedt i medfør af loven.«

Við hesum broyting mælir ein samd ídnaðarnevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. apríl. § 1 samtykt við 28-0 atkvøðum. Broyting til § 2, danskur tekstur, samtykt við 28-0, nr. 2) samtykt við 28 0, § 2 soleiðis broytt samtykt við 28-0, § 3 samtykt við 28-0, § 4, 3) samtykt við 28-0, § 4 soleiðis broytt við 28-0, § 5, 4) samtykt við 28-0, § 5 soleiðis broytt samtykt við 28 0, § 6 samtykt við 28-0, § 7, 5), 6) og 7) samtykt við 28-0, § 7 soleiðis broytt samtykt við 28-0, §8, 8) samtykt við 28-0. Samstundis er orðaljóðið á landsstýrisuppskotinum burturdottið. § 8 samtykt við 28-0. § 9 samtykt við 28-0, § 10, 9) og 10) samtykt við 28-0 atkvøðum. § 10 soleiðis broytt samtykt við 28-0 atkvøðum. § 11, 11) og 12) samtykt við 28-0, § 11 soleiðis broytt samtykt við 28-0 atkvøðum. § 12 samtykt við 28-0 atkvøðum. Við 28-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

14. apríl løgdu Heini O. Heinesen, Sverri Midjord, Olaf Olsen, Henrik Old og Eilif Samuelsen fram soljóðandi:

broytingaruppskot

Punkt 4 í álitinum verður broytt soleiðis:

§ 5, 2. stk. verður orðað soleiðis:
»Brúkt fiskiamboð sambært stk. 1 kunnu bert verða innflutt, um tey oru sóttreinsað eftir reglum ásettum av landsstýrinum. Tó kann landsstýrið í serligum førum, tá talan er um nótir og flótitrol eftir umsókn og eftir tilmæli frá landsdjóralæknanum geva undantaksloyvi.«

§ 5, stk. 2 formuleres således:
»Brugte fiskeudstyr i henhold til stk. 1 må kun indføres, såfremt det er desinfi sceret efter regler fastsat af landsstyret. Dog kan landsstyret i særlige tilfælde, når det drejer sig om noter og flydetrawl efter ansøgning og efter anbefaling af landsdyrelægen meddele dispensation.«

3. viðgerð 14. apríl. Broytingaruppskot til § 5 samtykt við 28-0 atkvøðum. § 5 soleiðis broytt samtykt við 28-0 atkvøðum. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F. L. j.nr. 1509-3-5-2-1. Lóg nr. 26 frá 30. apríl 1987.

29. Landsstýrismál.

Ár 1986, týsdagin 28. oktober varð gerðabók landsstýrisins 1985-86 framløgd og úthýtt.

9. apríl legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fram av landsstýrinum 28. oktober 1986 og beint í landsstýrismálanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen og Tummas Arabo) førir fram:

Gerðabók landsstýrisins fevnir yvir tíðarskeið frá 31. juli 1985 til 24. juli 1986.

21. november 1985 verður avgerð tikin um at strika Hvalba av listanum yvir nýtiligar útflutningshavnir. Hetta hevur samband við játtan av flutningsstudningi til útjaðarafiskavirki. Hóast hesa broyting hevur hvørki Fisk ella nakað annað fiskavirki, ið eigur rætt til flutningsstudning, fingið nakran studning útgoldnan. Orsøkin er at finna í eini manglandi kunngerð um flutningsstudning

til útjaðarafiskavirki, og verður tí heitt á landsstýrið um at tilevna hesa sum skjótast.

22. november 1985 verður samtykt at heita á uttanríkismálaráðið í Danmark um at kanna málið viðvíkjandi Dounreay á Caithness i Skotlandi. Hetta verður gjørt eftir áheitan frá umhvørvisfelagsskapinum The Dunters i Orknoyggjum.

6. juni 1986 verður samtykt, uftan á at málið hevur verið til umrøðu og kanningar, at heita á ríkismyndugleikararnar at mótmæla, at verkið og burturkast frá tí verður so nær Føroyum, at vandi er fyri skaðiligum árini.

Tað frættist einki aftur frá hesum máli fyrr enn í februar/mars í ár. Tá varð upplýst í Norðurlandaráðnum, at málið varð liggjandi í Keypmannahavn, og var sostatt ikki tikið í tí álvara, tað hevði uppiborið.

Her er eitt fullgott prógv fyri, at uttanríkisvirðurskifti okkara ikki eru í fulltryggum bondum, og mælt verður til, at hesin spurningur verður álvarsliga átaladur mótvegis teirri donsku stjórnini.

Visandi til frammanfyristandandi viðmerkingar mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 31. juli 1985 - 24. juli 1986 verður samtykt.

Minnilutin (Óli Breckmann) førir fram, at millum aðrar áhugaverdar upplýsingar, sum fáast burtur úr at lesa fundarfrásagnir landsstýrisins í nevnda tíðarskeiði, er, at hetta landsstýrið brúkar effinett somu viðgerð og avgreiðslu av skattasakum, sum undanfarna — eisini eftir gøluna, sum sostatt púra óneyðugt varð íspunnin av nevndarumboðum samgongunnar fyri einum ári síðan.

Minnilutin fýlist eisini á, hvussu ymisk viðgerðin hevur verið av teim nógvu umsóknunum um innflutning av skipum. Summir umsøkjarar skulu lúka strangar treytir fyri loyvi at byggja. Serliga órímuligt er krav landsstýrisins til summar umsøkjarar, at verandi skip skulu strikast, áðrenn tey nýggju verða skrásett. Heldur átti møguleikin fyri at selt við ávísari tíðarfreist tá, og um líkinda prísur fæst fyri gamla skipið. At tvinga skipaeigarar at selja í stundini kann føra til fíggjarliga vanskepnu, sum øll minnast frá stríðnum um »Háborg« í fjør, tá eigarin kundi umganga at forera eiggiligt brúkt skip burtur, um hann keypti gamlar og ónýtiligar útróðrarbátar, soleiðis at polifiskir makkarar hjá løgmanni kundu fáa eginpening til nýtt skip.

Gjørt verður vart við, at nýggj skip eru á veg, sum hava fingið álagt somu treytir sum »Háborg«. Væntandi standast trupulleikar av hesum sølukravi, tá ný-

bygningarnir eru komnir, um søluprísurin fyri tey gomlu skipini, sum skulu strikast í hýti, ikki eru nóg góðir.

Minnilutin finst eisini at teirri mannagongd, landsstýrið brúkti, tá Tvøroyrar Trolarafelag, sum beint frammanundan hevði fingið innflutningsloyvi til nýtt skip, aftanfyri at »Leivur Øssursson« varð seldur av landinum, misti hetta innflutningsloyvi. Tað var ístaðin latið nøkrum fáum politiskum vinum og kenningum, sum fingu sjómenn aftrat sær at leggja pening til, meðan Tvøroyrar Trolarafelag vistu av ongum og stóð eftir við svartaperi, »Leivur Øssursyni«, sum var negativ oginogn.

Síðan hevur landsstýrið skilt seg av við hesa høvuðpínu við at keypa hann til eykalutir (!), meðan Trolarafelagið nú hvørki eigur gamla skip, innflutningsloyvi tíansheldur nýtt skip. Tvøroyrar kommuna, býráðið og borgarar á staðnum standa sum kánus av hesi sniðgongu landsstýrisins. Nevndin í Trolarafelagnum og umboð fyri største einstaka parteigaranum vist av ongum, tá innflutningsloyvi skifti hendur við tveimum landsstýrisavgerðum (bls. 92 og 93 í gerðabókini, har ávísingin á seinra fundi til fyrra fund er skeiv). Landsstýrið brúkti ta undanførslu, at meirilutin í figgjarnevndini, sum annars stendur aftan fyri landsstýrið, ikki vildi eftirgeva almenn krøv í »Leivi Øssursyni«.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð viðgjørt saman við tingmáli nr. 135: Landsstýrismál. Bæði vórðu beind beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 13. apríl. Málið varð aftur beint í landsstýrismálanevndina, og er málið ikki komið aftur haðani.

30. Broyting í konkurslógini.

Ár 1986, mikudagin 29. oktober legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 187 frá 9. mai 1984 »om ændring af konkursloven, gældsbrevloven og lov om retsafgifter (betalingsstandsning, gældsanering m.v.) verður sett í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan við hesum broytingum:

1) § 1, nr. 24: Í § 208, stk. 1, § 214, stk. 2, og § 218, stk. 3, verður »Statstidende« broytt til: »Statstidende og den på Færøerne til offentlige bekendtgørelser autoriserede avis«.

2) § 1, nr. 24: Í § 210, stk. 3, verður »det sociale udvalg« broytt til: »socialforvaltningen« og »udvalget« broytt til: »socialforvaltningens«.

3) § 1, nr. 24: Í § 228, stk. 2, og § 229, stk. 2, verður »det sociale udvalg« broytt til: »socialforvaltningen«.

4) Í § 4 verður »Lov om retsafgifter« broytt til: »Lov for Færøerne om retsafgifter«.

5) § 4, stk. 1, verður orðað soleiðis: »Denne anordning træder i kraft.....«

6) Í § 4, stk. 2, verður »lovens ikrafttræden« broytt til: »Lovens ikrafttræden på Færøerne«.

Viðmerkingar:

Í 1985 samtykti løgtingið, at nýggja konkurslógin nr. 299 frá 8. juni 1977 varð sett í gildi í Føroyum.

Við lóg nr. 87 frá 9. mai 1984 er gjørd ein týðandi broyting í konkurslógini. Eftir broytingini kunnu persónar, ið eru kommir í so stóra skuld, at teir ongar møguleikar hava at koma fíggjarliga fyri seg aftur, fáa sína skuld niðurskrivaða til eina rímiliga upphædd, sum teir hava ein realistiskan møguleika fyri at gjalda.

Skipanin um skuldarábót er bert galdandi fyri persónar og kann sostatt ikki nýtast av partafeløgum og øðrum feløgum.

Umsóknir um skuldarábót skulu sendast skiftisrættinum, sum eftir einari samlaðari meting avger, um treytirnar er loknar eftir lógini.

Fær ein skuldarábót, eru høvuðsreglan tann, at skuldin verður sett so nógv niður, at skuldarin er førur fyri at gjalda skuldina eftir 5 árum.

Lækkingin av skuldini verður ásett í mun til vanligu inntøkuna og útreiðslurnar hjá skuldaranum tey næstu árini, soleiðis at viðkomandi við húski hevur møguleika fyri at hava ein sámiligan livifót.

Verður ein vegna aldur ella sjúku ikki mettur at hava nakra inntøku framvegis, kann øll skuldin avskrivast.

Umframt at gera av, hvussu nógv av skuldini skal strikast, tekur skiftisrættarin støðu til, hvussu restskuldin skal avdragast.

Heldur skuldarin ikki avdráttarskipanina, er møguleiki fyri at avtaka skuldarábótina, soleiðis at skuldarin av nýggjum kemur at hefta fyri alla skuldina.

Sorinskrivarin hevur einki at viðmerkja til, at lógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

1. viðgerð 6. nov. Málið varð beint í ræktarnevndina, sum 24. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Landsstýrið legði fyri tingið uppskot til samtyktar hesum viðvíkjandi hin 29. oktober 1986. Við lóg nr. 87 frá 9. mai 1984 er gjørd týðandi broyting í konkurslógini. Árið eftir — í 1985 — samtykti løgtingið at seta í gildi konkurslóg nr. 299 frá 8. juni 1977.

Høvuðsbroytingin í 1984-lógini er, at sambært henni kunnu persónar, sum eru komnir í so stóra skuld, at teir ongar møguleikar hava at koma figgjarliga fyri seg aftur, fáa skuldina niðurskrivaða til eina rímuliga upphædd, sum teir hava eina veruligan møguleika at rinda aftur. Henda skipan um skuldarábót er bert galdandi fyri persónar og kann ikki nýtast av partafeløgum og øðrum feløgum.

Tað verður skiftirættarin, sum eftir umsókn ger eina meting, um treytirnar eru loknar sambært lógini. Høvuðsreglan fyri skuldarábót er, at skuldin verður sett so nógv niður, at skuldarin verður førur fyri at gjalda skuldina aftur eftir 5 árum. Lækkingin verður ásett í mun til inntøkuna tey næstu 5 árini. Í ávísum førum kann øll skuldin strikast eftir avgerð skiftisrættarins. Í viðmerkingum landsstýrisins verður upplýst, at sorinskrivarin ongar viðmerkingar hevur til, at lógin verður sett í gildi í Føroyum.

Við 1. viðgerð hin 6. november varð málið beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið. Á fundi við nevndina vísti Jalgrím Hilduberg, fulltrúi, á, at ein týðandi broyting við teirri nýggju lógini er, at persónur, ið fær ognir sínar uppgjørdar sum trotabúgv, ikki — sum eftir teirri gomlu — missir persónlig rættindi; og hann helt lítlan vanda vera fyri misnýtslu. Hetta er eisini niðurstøðan í grein eftir W. E. von Eyben, professara (Ugeskrift for Rets væsen 2. nov. 1985), har hann ger metingar um henda spurning, eftir at lógin hevði verið í gildi í eitt ár.

Út frá omanfyrinevnda og út frá tí ónemniskjansligu og í flestum førum meiningarleysu í, at fólk verður skuldarbundið fyri lívið, mælir nevndin til, at lógin fær gildi í Føroyum.

2. viðgerð 26. mars 1987. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 501-4.

31. Lóg um føroyskt lóggávuvald og stýrisskipan innanfyri danska kongaríkið (heimastýrisskipan).

Ár 1986, týsdagin 28. oktober legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

lóg um føroyskt lóggávuvald og stýrisskipan innanfyri danska kongaríkið (heimastýrisskipan).

Tað verður viðurkent, at Føroyar eru serstakt land og fólk út frá bæði tjóðskaparligum, søguligum og geografiskum eginleikum.....

§ 1. Føroyar eru ein sjálvstýrandi tjóð innan danska ríkið. Innan karmarnar av hesi lóg yvirtekur føroyska fólkið við fólkavaldu umboðsstovni sínum, Løgtinginum, og einum av tinginum útnevndum umboðsvaldi, landsstýrinum, lóggávuvaldið og stýrisskipanina viðvikjandi Føroyum.

§ 2. Øll mál og málsøki uttan tey í § 3 nevndu verða prinsipielt at rokna sum føroysk sermál. Føroya Løgting avger, hvørji mál verða yvirtikin sum sermál, og nær yvirtøkan fer fram. Eisini kunnu ríkismyndugleikarnir krevja yvirtøkur av sermálum framdar.
2. stk. Føroyar yvirtaka eisini útreiðslurnar í sambund við yvirtiknu sermálini. Tó kunnu ríkismyndugleikarnir eftir nærri avtalu við føroyska stýrið veita ávísan fíggjarligan stuðul.

§ 3. **Hesi málsøki verða fyribils at rokna sum felagsmál:**
1. Regentviðurskifti,
2. Dóms- og rættarviðurskifti,
3. Uttanríkisviðurskifti,
4. Verju- og hernaðarviðurskifti.

Hóast hesi mál eru felagsmál, kunnu avtalur verða gjørdar um føroyskt ræði og avgerðarrætt á teim undir 3 og 4 nevndu málsøkjum.

§ 4. Fyri tey málsøki, sum hoyra undir føroyska stýrið, hevur hetta löggevandi og fyrisitingarligan myndugleika. Tær lógir, sum Løgtingið samtykkir og Landsstýrisins formaður staðfestir, fáa heitið løgtingslógir.

§ 5. Ríkislógir ella aðrar forskriftir viðvikjandi málsøkjum sambært 3. grein verða ikki settar í gildi í Føroyum, fyrrenn Løgtingið hevur góðkent tær.

§ 6. Føroyingur er hann, sum hevur danskan borgararætt og er heimahoyrandi í Føroyum. Tó kann eftir serligum reglum gerast skipan um serligan føroyskan heimarætt.
2. stk. Føroyskt pass verður útskrivað við upplýsing um, at viðkomandi er føroyingur og danskur ríkisborgari.

§ 7. Føroyskt er almenna málið í Føroyum. Danskt verður lært væl og virðiligt. Í almennum viðurskiftum kann danskt eisini verða brúkt.

§ 8. Í donsku uttanríkismálaráðnum og á donskum umboðsstovum uttanlands kunnu eftir samráðingum millum stjórnirnar og landsstýrið fólk verða sett at taka sær av føroyskum málum. Útreiðslurnar, ið stundast av hesum, verða goldnar av føroyska landskassanum.

§ 9. Føroyska flaggið, Merkið, er góðkent, og fyriskipanir flagginum viðvíkjandi verða ásettar við serligari løgtingslóg. Ríkismyndugleikarnir kunnu nýta Dannebrog í Føroyum, men kunnu eisini nýta Merkið, har hetta verður hildið hóskandi. Loyvt er eisini privatum — persónum, felagum og stovnum — at nýta Dannebrog á landi.

§ 10. Ríkisumboðsmaðurin er ovasta umboð fyri ríkið í Føroyum. Hann er leiðari av ríkisins fyristing í Føroyum. Sambært sítt embæti hevur hann rætt at møta til fundar í Løgtinginum og eisini talurætt í felagsmálum, men ikki atkvøðurætt. Ríkisumboðsmaðurin skal hava eintøk av øllum løgtingslógum og øðrum av føroyska heimastýrinum gjørdum kunngerðum eins og av leim samtyktum, sum gjørdar eru á Løgtingi og í Landsstýrinum.

§ 11. Allar í løtuni í Føroyum galdandi fyriskipanir, sum ikki eru í stríð við hesa lóg, verða í gildi, til tær verða verandi broyttar ella settar úr gildi av rætta myndugleika.

§ 12. Henda lóg fær gildi 1. januar 1988, og samstundis fer úr gildi lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um »Færøernes Hjemmestyre«.

Forslag

til

lov om færøsk lovgivningsmyndighed og styrelsesordning indenfor det danske kongerige (hjemmestyreordning).

Først et præambel om anerkendelse af Færøerne som et særligt land og folk i henhold til både nationale, historiske og geografiske kendsgerninger.

§ 1. Færøerne udgør en selvstyrende nation indenfor det danske rige. Indenfor rammerne af denne lov overtager det færøske folk ved sin folkevalgte repræsentation, Lagtinget, og en af tinget udnævnt forvaltning, Landsstyret, lovgivningsmagten og styrelsesordningen vedrørende Færøerne.

§ 2. Alle sager og sagsområder bortset fra dem i § 3 nævnte er principielt at regne som færøske særanliggender. Færøernes Lagting tager afgørelse om, hvilke sager overtages som særanliggender, og hvornår overtagelser skal ske. Rigsmyndighederne kan også kræve, at overtagelse af særanliggender bliver gennemført.
Stk. 2. Færøerne overtager også udgifterne i forbindelse med de overtagne særanliggender. Dog kan rigsmyndighederne efter nærmere aftale med det færøske styre yde finansiel støtte.

§ 3. **Disse sagsområder betragtes foreløbig som fællesanliggender:**
1. Regentanliggender,
2. Doms- og retsvæsen,
3. Udenrigsanliggender,
4. Forsvars- og militæranliggender.

Selv om disse sagsområder er fællesanliggender kan der sluttes aftaler om færøsk rådighed og bestemmelsesret over de under 3 og 4 nævnte sagsområder.

§ 4. For de sagsområder, som henhører under det færøske styre, har dette den lovgivende og administrative myndighed. De af Lagtinget vedtagne og af Landsstyrets formand stadfæstede love benævnes lagtingslove.

§ 5. Rigslove eller andre forskrifter vedrørende sagsområder henhørende under § 3 kan ikke sættes i kraft på Færøerne, før Lagtinget har godkendt dem.

§ 6. Som færing anses den, som har dansk statsborgerret og er hjemmehørende på Færøerne. Dog kan der efter særlige regler udfærdiges en ordning om særlig færøsk hjemstævnsret.
Stk. 2. Færøsk pas bliver udstedt med oplysning om, at vedkommende er færing og dansk statsborger.

§ 7. Færøsk er det officielle sprog på Færøerne. Dansk skal læres godt og omhyggeligt. I offentlige forhold kan dansk også benyttes.

§ 8. I det danske udenrigsministerium og på danske repræsentationer i udlandet kan der efter forhandlinger mellem regeringen og landsstyret ansættes personer til varetagelse af færøske sager. Udgifterne herved afholdes af den færøske landskasse.

§ 9. Det færøske flag »Merkið« er godkendt, og forskriften vedrørende flaget fastsættes i særlig lagtingslov. Rigsmyndighederne kan benytte Dannebrog på Færøerne, men kan også benytte »Merkið«, hvor dette er rimeligt. Det er også tilladt private — personer, selskaber, foreninger og institutioner — til på land at anvende Dannebrog.

§ 10. Rigsombudsmanden er Rigets øverste repræsentant på Færøerne. Han er leder af rigets administration på Færøerne. I embeds medfør har han adgang til Lagting møder og taleret i fællesanliggender, men ikke stemmeret. *Stk. 2. Rigsombudsmanden skal have eksemplar af alle lagtingslove og andre af de færøske hjemmestyre udstedt bekendtgørels samt af de beslutninger, som Lagtinget og Landsstyret har foretaget.*

§ 11. Alle nu på Færøerne gældende bestemmelser, der ikke strider mod denne lov, forbliver i kraft, indtil de ændres eller ophæves af rette myndighed.

§ 12. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1988, og samtidig ophæves lov. nr. 137 fra 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre.

Viðmerkingar:

I tingsetuni 1985 (tingmál nr. 3/1985) setti Fólkaflokkurin fram uppskot til samtyktar um at seta eina løgtingsnevnd, sum kundi taka sær serkøna hjálp, við umboðum úr øllum tingflokkum til at endurskoða heimastýrislógina. Málið fall við atkvøðugreiðsluna á tingi og ein av ábreiðslunum móti uppskotinum var, at tað var ov lítið ítøkiligt. Ætlanin frá Fólkaflokksins síðu við ikki at gera eitt nágreiniligt uppskot var, at flokkarnir í einum nevndararbeiði kundu framføra síni sjónarmið óbundnir av framkomnum uppskoti.

Men tá ið sjónarmiðini, um at hava ítøkilig uppskot at ganga út frá vóru komin fram undir viðgerðini av málinum, lovaði Fólkaflokkurin undir 2. viðgerð at koma við einum slíkum í tingsetuni 1986.

Hetta uppskot fyriliggur nú og verður við hesum lagt fram. Uppskotið gongur ikki so langt sum Fólkaflokkurin endaliga kundi hugsað sær Føroya statsrættarligu støðu, men hinvegin er tað eitt týðandi stig á vegnum fram móti fullum sjálvstýri, og skuldi ein stórur meiriluti á Føroya Løgtingi kunnað tikið undir við tí.

Uppskotið er ikki ultimativt og verður lagt fram sum eitt samráðingargrundarlag til føroysku flokkarnar. Um meiriluti fæst á Løgtingi fyri eini nýggjari stýrisskipan, verða síðani samráðingar at føra við donsku myndugleikarnar um at fáa hana setta í verk.

Viðvíkjandi sjálvum lógaruppskotinum er at siga, at størsta frávikið frá nú galdandi heimastýrislóg er, at uppskotið ger øll málsøki, burtursæð frá teimum undir grein 3 nevndu, til sermál.

Á hendan hátt kann Føroya Løgting fella donsku ríkismyndugleikarnir samtykkja yvirtøku av næstan øllum vanligum málsøkjum. Tann praktiska hugsanin aftanfyri er eisini tann, at ein blokkstuðulsskipan fæst í lag, sum kann avloysa núverandi refusiónsskipanina. Við slíkari lóggávu er óneyðugt at hava nakran lista við A og B málum. Heldur ikki skuldi verið neyðugt at havt eina reglu sum tað núverandi um at seta eina serliga nevnd við umboðum fyri heimastýrið, stjórnina og hægstarætt at avgera ivamál um heimastýrisins myndugleika.

Tikin er eisini við ein regla um, at serligur føroyskur heimarættur verður skipaður (§6). Føroyskt pass verður eisini útskrivað eftir hesum reglum. Óneyðugt er tí eisini við eini serligari reglu í hesi lóg um, at valrættur og valbarri til Løgtingið, kommunur og annað skal bert vera fyri føroyingar. Tað kemur av sjálvari skipanini.

Viðvíkjandi føroyska málinum er lógargreinin (§7) bert broytt til at stað-

festa enn betur, at føroyskt er almenna málið í Føroyum. Tó er tað rætt at kunna nýta danskt av praktiskum orsøkum.

Flaggspurningurin má haldast at vera loystur, men ríkismyndugleikarnir eiga at hava loyvi til at nýta føroyska flaggið (§9), t.d. dómarin, fútin, sýslumenn v.m.

§ 14 í núverandi heimastýrislóg um ríkisdagsumboðan er ikki tikin við. Eftir okkara hugsan eigur føroyska fólkatingsumboðanin at verða avtikin, og tí er tað av stórum týdningi, at reglan fer úr heimastýrislógini. Síðani má finnast út av at broyta ásetanina í grundlógini, eins og møguliga aðrar grundlógarbroytingar.

1. viðgerð 5. november. Málið varð beint í serliga nevnd við einum limi úr hvørjum flokki.

6. november varð serliga nevndin til at viðgera málið var vald soleiðis: Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen, Hans Jacob Debes, Jørgen Thomsen, Tórður Niaclasen, Adolf V. Hansen og Hilmar Kass.

10. apríl 1987 legði serliga nevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum hin 28. oktober 1986. Við 1. viðgerð hin 5. november varð tað beint í serstaka nevnd við einum limi úr hvørjum flokki.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin heldur, at uppskotið er so umfatandi, við tað at allur stýrisskipanarspurningurin liggur í tí, at hon eigur at fáa stundir til at viðgera tað til lítar. Nevndin skjýtur tí upp soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur nevndini, sum skal viðgera tingmál nr. 31/1986: Lóg um føroyskt lóggávuvald og stýrisskipan innan fyri danska kongaríkið (heimastýrisskipan), at virka sum milluntinganevnd og at leggja málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskot nevndarinnar til samtyktar varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

32 Keyp av húsaognum.

Ár 1987, týsdagin 3. februar legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av húsaogn.

§ 1. Landsstýrið verður heimilað at keypa ognirnar matr. nr. 5, 7, 13, 16 og 36 í Tórshavn.

§ 2. Játtaðar verða kr. 3.000.000, sum verða at leggja út úr landskassanum.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om køb af husejendomme.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe matr. nr. 5, 7, 13, 16 og 36 i Tórshavn.

§ 2. Der bevilges hertil kr. 3 mill. kr., som betales af landskassen.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Grundgevingin fyri hesi støðu er at gera møguleikar fyri at savna mest møguligt av landsfyrisitinginí á einum øki. Tá ið farið verður norður um ta linju, sum hevur verið markið higartil, verður víst á, at landið eigur gomlu útvarpshúsini á Bryggjubakka.

Ognirnar eru virðismettar av Chr. E. Lambhauge, verkfrøðingi.

Áðrenn uppboðssøluna varð gjørd semja við Tórshavnar býráð um at geva eitt samlað boð fyri ognirnar í nevnda trotabúgvi. Síðani skuldi landsstýrið keypa tær ognir, ið landsstýrið hevði áhuga fyri frá býráðnum fyri eina samlaða upphædd upp á 3 mió. kr.

Fíggjarnevndin er vorðin kunnað um málið í skrivum 7. januar og 24. juni 1986.

1. viðgerð 11. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndini, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Hesi trý málini eru uppskot um at keypa húsognir í Tórshavn til ávís endamál hjá tí almennu fyrisitingini, soleiðis sum tilskilað er í viðmerkingunum til

tingmálið.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hesi mál og hevur hugt at húsaognunum, ið skotnar eru upp at keypa í løgtingsmáli nr. 105 »Húsaognir í Jónas Broncksgøtu«, meðan stundir ikki hava verið til at hyggja at hinum báðum ognunum, sum skotið er upp at keypa.

Í løgtingsmáli nr. 54/1986: Keyp av húsaognum (landslæknahúsini) verður biðið um	5 mió.
Í løgtingsmáli nr. 32/1986: Keyp av húsaognum í Tinganesi verður biðið um	4 mió.
Í løgtingsmáli nr. 105: Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu verður biðið um	11 mió.
tilsamans	20 mió.

Ásannandi tørvin mælir fíggjarnevndin til, at henda saman við landsstýrinum fær heimild til at finna hóskandi høli møguliga við at byggja nýggj høli.

Ein samd nevnd setir fram í staðin fyri uppskot landsstýrisins soljóðandi:

Uppskot


til

løgtingslóg um keyp av húsaognum.	*lagtingslov om køb af husejendomme.*
§ 1. Heimilað verður landsstýrinum saman við fíggjarnevndini at byggja ella keypa hóskandi høli til almenna umsiting.	*§ 1.* Landsstyret sammen med finansudvalget bemyndiges til at bygge eller købe egnede lokaler til offentlig forvaltning.
§ 2. Neyðugur peningur verður at útvega við eini eykajáttan.	*§ 2.* Nødvendige beløb bevilges veg en ekstrabevilling.
§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	*§ 3.* Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 14. apríl. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 54 Keyp av húsaognum (landslæknahúsini) og 105 Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu. § 1 varð samtykt við 22-0 atkvøðum, §§ 2 og 3 samtyktar við 22-0 atkvøðum. Við 21-0 atkvøðum varð samtykt at beina málini soleiðis samtykt til 3 viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2446-1-2. Lóg nr. 31 frá 30. apríl 1987.


Tinganes
09.01 1986

33 Atgongd hjá fremmandum herskipum og hernaðarflogførum til danskt øki í friðartíð.

Ár 1986, mikudagin 29. oktober legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at kgl. fyriskipan nr. 73 frá 27. februar 1976 »om fremmede orlogsfartøjers og militære luftfartøjers adgang til dansk område under fredsforhold« verður kunngjørt at galda fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at kongalig fyriskipan nr. 73 frá 27. februar 1976 »om fremmede orlogsfartøjer og militære luftfartøjer adgang til dansk område under fredsforhold« verður kunngjørd í Føroyum.

Kongaliga fyriskipani avloysir kongaliga fyriskipan nr. 356 frá 25. juli 1951 »Om fremmede krigsskibe og militære luftfartøjers adgang til dansk område under fredsforhold«, sum framvegis er galdandi í Føroyum.

Í fyriskipanini verður skilt millum **innara** sjóøkið, sum er havøkið innan fyri basislinjurnar og **uttara** sjóøkið, sum er havøkið millum basislinjurnar og tríggjar fjórðingar úr hesum linjum.

Eftir fyriskipanini frá 1976 skulu hernaðarflogfør altíð hava loyvi at flúgva yvir føroyskum land- og sjóøki og at lenda í Føroyum.

Herskip skulu hava loyvi at koma inn á innara sjóøki og at steðga á uttara sjóøkinum. Vanlig sigling gjøgnum uttara sjóøkið krevur bert fráboðan frammanundan.

Í mun til galdandi fyriskipan frá 1951 er talan um eina skerping, við tað er herskip bert hava fráboðanarskyldu um sigling á innara sjóøkinum. Loyvi frammanundan til steðg og til gjøgnumsigling á uttara sjóøki eru ikki neyðug nú, uttan so at steðgurin varir longri enn 2 samdøgur, og er tá bert neyðugt við fráboðanum.

Vísandi til tað, id her er ført fram, loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri løgtingið.

Viðlagt fylgja eintøk av lógarskipanum frá 1951 og 1976.

1. viðgerð 4. november. Málið varð uttan orðaskifti beint í rættarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Landsstýrið legði eftir fyrispurningi frá ríkisumboðnum uppskot til samtyktar fyri tingið hin 29. oktober 1986. Við 1. viðgerð hin 4. november 1986 varð málið beint í rættarnevndina.

Málið snýr seg um við løgtingssamtykt at seta í gildi fyri Føroyar kgl. fyriskipan nr. 73 frá 27. februar 1976 »om fremmede orlogsfartøjers og militære luftfartøjere adgang til dansk område under fredsforhold«.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður upplýst, at nevnda kgl. fyriskipan skal koma í staðin fyri kgl. fyriskipan nr. 356 frá 25. juli 1951 »Om fremmede krigsskibes og militære luftfartøjers adgang til dansk område under fredsforhold«, sum enn er galdandi í Føroyum.

Fyriskipanin ger mun á innara sjóøki, sum er havøkið innan fyri grundlinjurnar, og ytra sjóøkið, sum gongur frá grundlinjunum 3 fjórðingar út. Avmarkingin av sjóøkinum við Føroyar er ásett í »Anordning om afgrænsningen af søterritoriet ved Færøerne« frá 21. desember 1976, sum Jalgrím Hilduberg, fulltrúi, hevur latið nevndini eftir samrøðu.

Á fundi í rættarnevndin hevur Jóhan Djurhuus, skrivstovustjóri, greitt frá, at fráboðanarskyldan hjá fremmandum herskipum er skerpt, við tað at í framtíðini skulu tey boða frá sigling í ytra sjóøki og fáa serstakt loyvi at koma í tað innara sjóøkið.

Av hernaðarflogførum verður kravt, at tey ikki hava vápn um borð. Henda treyt er verri at seta herskipum, sum vanliga mugu haldast at vera stríðsbúgvin. Hugsandi um tann møguleika, at hesi fremmandu herskip kunnu hava kjarnorkuvápn umborð, vísir rættarnevndin til samtykt Føroya Løgtings frá 24. februar 1970 um lýsing av Føroyum sum kjarnorkuvápnafrium øki.

Nevndin setir tí fram soljóðandi broytt:

Uppskot

til

samtyktar

I. Løgtingið samtykkir, at kgl. fyriskipan nr. 73 frá 27. februar 1976 »om fremmede orlogsfartøjers og militære luftfartøjers adgang til dansk område under fredsforhold« verður lýst at galda í Føroyum.

II. Løgtingið gongur út frá, at samtykt tingsins frá 14. februar 1970 um Føroyar sum kjarnorkufrítt øki verður ikki brotin.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

Fl.j.nr. 2-1.

34 Sáttmáli ímillum Føroya landsstýri og ríkisstjórnina í Kongaríkinum Danmark øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska Tjóðveldinum hinumegin um sínámillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið.

Á 1986, mikudagin 29. oktober legði løgmaður vegna landsstýrið fram:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir hjálagda sáttmála ímillum Føroya Landsstýri og ríkisstjórnina í Kongaríkinum Danmark øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska Tjóðveldinum hinumegin um sínámillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið.

Viðmerkingar:

Føroyar hava áður gjørt slíkar sáttmálar um fiskiskap við t.d. Ísland, Noreg, EEC, Canada, USA og Sovejttsamveldið. Hesir áseta reglur, ið er karmur sum sínámillumfiskiskap fyri ávís á i senn, um ikki ein av pørtunum sigur sáttmálan ella skipanina upp.

Skip úr Týska Demokratiska Tjóðveldinum hava havt høvi til í nøkur ár at veiða svartkjaft á landleið Føroya.

Frá 1980 hava føroyingar havt høvi til at veiða tosk í Eystursjónum út fyri strondum Týska Demokratiska Tjóðveldisins.

Umboð fyri Føroya Landsstýri og Týska Demokratiska Tjóðveldið samráddust í Tórshavn í døgunum 12. - 14. mai í ár og endaðu hesar samráðingar við, at hjálagdi rammusáttmáli var undirritaður av Føroya Landsstýri, umboð fyri donsku stjórnina og stjórn Týska Demokratiska Tjóðveldsins.

Sáttmálin snýr seg fyrst og fremst um, at hvør partur áseting á hvørjum ári — við umhugsni um tørvin á skynsamari stýring av livandi ríkidøminum — eftir høskandi samráðingar kvoturnar hjá fiskiskipunum hjá hinum partinum eins og tey øki, har hesar kvotur kunnu verða veiddar og undir hvørjum treytum fiskað kann verða.

Hesin sáttmáli kemur í gildi tann dag, partarnir hava boðað hvørjum øðrum frá, at neyðugar góðkenningar av málsviðgerðini eru loknar.

Sáttmálin verður verandi í gildi í fyrsta fimm ára tíðarskeiðnum. Gildi hansara leingist av sær sjálvum við fimm árum í senn, um hann ikki seks mánaðir undan gildisloki verður skrivliga uppsagdur av øðrum partinum.

Viðmerkjast skal, at fyrsta tíðarskeiðið er sett til 5 ár ístaðin fyri sum vanligt 10 ár, fyri at hesin rammusáttmálin kann fara úr gildi umleið samu tíðarskeið sum hinir rammusáttmálarnir.

Landsstýrið leggur við hesum sáttmálan fyri løgtingið til góðkenningar.

SÍ SKJAL 7.

1. viðgerð 4. november. Málið varð uttan orðaskifti beint í marknaðarnevndina.

sum 18. november legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 29. oktober 1986 og undir 1. viðgerð 4. november beint í marknaðarnevndini.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 3. december. Uppskot um at beina málið aftur í marknaðarnevndina fall við 6-0 atkvøðum. Uppskotið varð síðani samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-3.

35 Bann móti handli við Suðurafrika og Namibia

Ár 1986, hósdagin 6. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um bann móti handli við Suðurafrika og Namibia.

lagtingslov om forbud mod handel med Sydafrika og Namibia.

§ 1. Innflutningur til Føroya av vørum og tænastuveitingum við uppruna í Suðurafrika ella Namibia og útflutningur av vørum og tænastuveitingum úr Føroyum til Suðurafrika ella Namibia er bannaður.

2. stk. Reglurnar í 1. stk. fevna ikki um

1) inn- og útflutning, ið ikki er av vinnuligum slag og
2) útflutning av framleiðsluni til einans læknalig endamál.

§ 1. Indførsel til Færøerne af varer og tjenesteydelser med oprindelse i Sydafrika eller Namibia og udførsel af varer og tjenesteydelser fra Færøerne til Sydafrika eller Namibia må ikke foretages.

Stk. 2. Bestemmelserne i stk. 1 omfatter ikke

1) ind- og udførslen, der ikke har erhvervsmæssig karakter og
2) udførsel af produkter til rent lægelige formål.

§ 2. Bannið móti handli við Suðurafrika og Namibia fevnir eisini um flutning av olju og oljuúrdráttum við føroyskum skipum til og úr Suðurafrika og Namibia.

§ 2. Forbudet mod handel med Sydafrika og Namibia omfatter også transport af olie og olieprodukter med færøske skibe til og fra Sydafrika og Namibia.

§ 3. Landsstýrið kann veita undantaksloyvi frá banninum í §§ 1 og 2.

§ 3. Landsstyret kan dispensere fra forbudet i §§ 1 og 2.

§ 4.

Persónar, herundir nevndarlimir í virkjum, ið bróta §§ 1 og 2, verða revsaðir við bót ella hefti.

§ 4.

Personer, herunder bestyrelsesmedlemmer i virksomheder, der overtræder §§ 1 og 2, straffes med bøde eller hæfte.

2. stk. Er brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sjálvt koma undir bót.	*Stk. 2.* Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.
§ 5. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.	*§ 5.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Fleiri lond hava sett ymisk tiltøk í verk móti Suðurafrika fyri at mótmæla apartheidpolitikkinum í hesum landi.

Í norðanlondum hava Danmark og Noreg samtykt lógir, sum banna øllum handli við Suðurafrika og Namibia, og í hinum norðanlondunum verður umhugsað at viðtaka tilsvarandi lógir.

Landsstýrið heldur, at Føroyar eiga at taka undir við tiltøkum, sum kunnu vera við at steðga apartheidpolitikkinum í Suðurafrika, og setir við hesum fram uppskot til løgtingslóg um bann móti handli við Suðurafrika.

Lógin fevnir um vanligan handil, tænastuveitingar, flutning av olju og oljuúrdráttum við føroyskum skipum til og úr Suðurafrika og Namibia.

Í øðrum løgtingsmáli er lagt uppskot fyri tingið um at seta kgl. fyriskipan í gildi fyri Føroyar, ið forbjóðar øllum handli og flutningi av krígsútgerð til Suðurafrika.

1. viðgerð 27. november. Málið varð beint í nevnd. Atkvøðast skuldi á næsta fundi um hvørja nevnd.

2. december gjørdi formaðurin av, at málið skuldi í marknaðarnevndina.

Málið ikki afturkomið úr nevndini.

F.Lj.nr. 10-2-17.

36 Broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna.

Ár 1986, týsdagin 2. desembur legdi logmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður nýtt 2. stk. orðað soleiðis:
»Um landsstýrismaður, sum hevur rætt til frí hús sambært 1. stk., 2. pkt., í staðin ynskir at varðveita upprunaliga bústað sín, verður veitt honum árligt kostnaðarendurgjald eftir bústaðnum soleiðis:

Norðstreymoy og Eysturoy	kr. 21.750
Suðurstreymoy, undantikið Tórshavn, Argir, Hoydalar, Hoyvík og Hvítanes	kr. 12.000
Aðrastaðir	kr. 31.500

Kostnaðarendurgjaldið er ikki skattaskyldugt.«

2) § 4 verður orðað soleiðis:
»Fyri hvørji 3 stig pristalið broytist omanfyri 100, verður samsýningin eftir § 1, 1. stk., 1. pkt. hækkað ella lækkað við 1.260,- kr. Samsýningarnar eftir § 1, 2. stk., §§ 2 og 5 verða hækkaðar ella lækkaðar við 3 % fyri hvørji 3 stig, prístalið er

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til landsstyresmænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 5. august 1971 med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1 affattes nyt stk. 2 således:
»Om landsstyresmand, som har ret til fri bolig efter stk. 1, pkt. 2, i stedet ønsker at opretholde sin oprindelige bolig, ydes der ham et årligt omkostningstillæg efter boparten således:

Norðstreymoy og Eysturoy	kr. 21.750
Suðurstreymoy med undtagelse af Tórshavn, Argir, Hoydalar, Hoyvík og Hvítanes	kr. 12.000
Andetsteds	kr. 31.500

Omkostningstillægget er ikke skattepligtigt.«

2) § 4 affattes således:
»For hver 3 point pristallet ændres over 100 bliver vederlaget efter § 1, stk. 1, pkt. 1 forhøjet eller nedsat med 1.260 kr. Vederlag efter § 1, stk. 2, §§ 2 og 5, forhøjes eller nedsættes med 3 % for hver 3 point, pristallet overstiger 100. Falder pris-

omanfyri 100. Fellur pristalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð.

2. stk. Samsýningar eftir hesi lóg verða haraftrat javnaðar við somu prosentvísu reallønarhækking, sum tænastumenn fáa.

3. stk. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.«

tallet ned under 100, finder ingen pristalsregulering sted.

Stk. 2. Vederlag efter denne lov reguleres også procentvis med samme reallønsforhøjelse som i jenestemænd får.

Stk. 3. Dyrtidsreguleringen foretages hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1985.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. februar 1985.

Viðmerkingar:

Eftir § 1 í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 við seinni broytingum um samsýning landsstýrismanna eiga landsstýrismenn, sum ikki hava bústað í Tórshavnar kommunu ella Tórshavnar uttanbíggja kommunu undantikið Syðradalur og Norðadalur, frí hús. Í ávísum førum hava landsstýrismenn í staðin fyri at fáa frí hús í Tórshavn valt at búgva aðrastaðni í landinum. Tá hevur landsstýrið, aftan á góðkenning fíggjarnevndarinnar, veitt teimum landsstýrismonnum, sum ikki samstundis fáa kostnaðarendurgjald sum løgtingsmenn í staðin fyri frí hús, eitt endurgjald svarandi til kostnaðarendurgjald fyri tingmenn, sum búgva í sama øki sum landsstýrismaðurin.

Landsstýrið metir tó, at lógarheimild eigur at fáast fyri, at kostnaðarendurgjald verður latið í staðin fyri frí hús og verður hetta broytingaruppskot tí lagt fyri tingið.

Viðmerkjast skal, at landsstýrið metir, at útreiðslurnar hjá landsstýrismanni av at búgva uttan fyri Tórshavn eru størri enn hjá løgtingsmanni, við tað at landsstýrismaður í størri mun skal hava tilhald í Tórshavn. Kostnaður landskassans av at veita landsstýrismanni frí hús í Tórshavn liggur um kr. 7 - 9.000 um mánaðin í løtuni. Landsstýrið skjýtur tí upp, at kostnaðarendurgjaldið til landsstýrismenn verður 1⅓ ferð tað, løgtingsmenn fáa. Broytingin í § 1 er staðfesting av gildandi praksis.

1. viðgerð 10. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 29. januar 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1986 og eftir 1. viðgerð tann 10. í sama mánað beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir eina samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. februar 1987. § 1 varð samtykt við 25-0, § 2 við 27-0 atkvøðum. Við 27-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. februar. Við 18-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina, sum 10. apríl legði fram:

Álit II

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1986 og eftir 1. viðgerð tann 10. í sama mánað beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin viðgjørdi umálið, og mælti ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Málið varð undir 2. viðgerð 4. februar samtykt við 27-0 og undir 3. viðgerð 10. februar við 18-0 atkvøðum beint aftur í fíggjarnevndina, orsakað av at undir orðaskiftinum tók ivi seg upp um prístalsviðgerðartátlin.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Hergeir Nielsen, Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) hevur viðgjørt málið av nýggjum og fingið kannað áðurnevndu viðurskifti.

Um prístalsviðgerðina er at siga, at tað er upplýst fyri nevndini, at talan er um vanliga prístalsviðgerð.

Eftir fyriliggjandi lógaruppskoti verður kostnaðarendurgjaldið hálvaaðru ferð í mun til tað, ið tingmenn fáa.

Meirilutin er samdur um, at henda lóg ikki eigur at fáa afturvirkandi gildi.

Sostatt verður sett fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 2. verður orðað soleiðis:	*§ 2.* affattes således:
»Henda lóg fær gildi beinanvegin.«	»Denne lov træder i kraft straks.«

Við hesi broyting mælir ein meiriluti løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) vísir til viðmerkingar landsstýrisins um, at fyriliggjandi uppskot er lógarfesting av galdandi praksis.

Minnilutin er samdur við landsstýrinum um, at tað er rætt at fáa hetta inn í sjálva lógina.

Tað er eisini rímiligt, at landsstýrismenn fáa hálvaaðru ferð tað kostnaðar-

endurgjald, sum løgtingsmenn fáa, tí landsstýrismenn hava munandi størri útreiðslur.

Fyri at lógarfesta galdandi praksis rættvíst, verður neyðugt at broyta § 2, og setir minnilutin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 2. verður orðað soleiðis:

»Henda lóg fær gildi beinanvegin, tó verður lógin galdandi fyri teir landsstýrismenn, sum eru og hava verið undir galdandi praksis, við góðkenning fíggjarnevndarinnar.«

§ 2. formuleres således:

»Denne lov træder i kraft straks, idet dog loven får gyldighed også for de landsstyresmænd, der er og har været landsstyresmænd under værende praksis med accept af finansudvalget.«

Framhaldandi 3. viðgerð 13. apríl. Málið beint aftur í fíggjarnevndina og ikki aftur komið haðani.

F.L.j. nr. 200-3-4

37 Broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd.

Ár 1986, hósdagin 6. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um arbeiðaravernd.

§ 1.

Í løgting nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd við seinri broytingum

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejderbeskyttelse.

§ 1.

I lagtingslov nr. 58 af 24. maj 1974 om arbejderbeskyttelse med senere æn-

verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 33 verður sum nýtt 3. stk. sett:

»Landsstýrinum verður heimilað at áseta reglur um fráboðan av arbeiðsvanlukkum, eitringartilburðum, vinnuligum sjúkum og øðrum viðurskiftum av týdningi fyri arbeiðaraverndina á virkjum og við arbeiði, ið er umfatað av hesi lóg.«

2. Kapittul 6 verður soljóðandi:

»Arbeiðsumhvørvisráð.

§ 38.

Landsstýrinum verður heimilað at seta arbeiðsumhvørvisráð við einum umboði fyri arbeiðsgevarafeløgini, einum umboði fyri handverksmeistarafeløgini, einum umboði fyri handverkarafeløgini, einum umboð fyri arbeiðsgevararnar innan skrivstovu og krambúðaryrkið og stjóranum fyri Arbeiðseftirlitið, ið er formaður ráðsins.

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur fyri virki ráðsins.

dringer foretages følgende ændringer:

1. I § 33 tilføjes som nyt stk. 3:

»Landsstyret bemyndiges til at fastsætte regler om meddelelse af arbejdsulykker og andre forhold af betydning for arbejderbeskyttelsen i virksomheder og ved arbejde, der er omfattet af denne lov.«

2. Kapitel 6 affattes således:

»Arbejdermiljøråd.

§ 38.

Landsstyret får hjemmel til at nedsætte et arbejdermiljøråd med en repræsentant for arbejdsgiverforbundene, et ombud for arbejderforbundene, en repræsentant for håndværkerforbundene, en repræsentant for arbejdsgiverne indenfor kontor og handel og direktøren for Arbejdstilsynet, som er rådets formand.

Stk. 2. Landsstyret får hjemmel til at fastsætte nærmere regler for rådets virksomhed.

§ 2.

Kapittul 6 verður hereftir kapittul 7, og §§ 38 - 40 verða hereftir §§ 39 - 41.

§ 2.

Kapitel 6 bliver herefter kapitel 7, og §§ 38 - 40 bliver herefter §§ 39 - 41.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Ad. I: Orðingin í § 33 um skaðafráboðan til Arbeiðseftirlitið er ógvuliga veik, og er tað tí neyðugt við hesum ískoyti, soleiðis at landsstýrið fær heimild til við kunngerðum at lýsa meiri ítøkiligar reglur fyri, hvat skal metast sum arbeiðsskaðar, hvør skal fráboða o.a. Endamálið við hesi fráboðan er fyrst og fremst at fáa til vega álítandi hagtøl, sum lýsa arbeiðsskaðarnar so gjølla sum gjørligt, soleiðis at fyribyrgjandi tiltøk kunnu verða sett í verk.

Ad. 2): Endamálið við Arbeiðsumhvørvisráðnum er at geva partunum á arbeiðsmarknaðinum høvi til at gera sína áskoðan galdandi fyri einum tryggum og góðum arbeiðsumhvørvi.

1. viðgerð 27. november. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 10. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fram av landsstýrinum t. 6. nov. 1986 og undir 1. viðgerð t. 27. nov. beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið og er eftir viðgerðina samd um, at broytingin eigur eisini at tilskila, hvør tekur sær til at velja ráðið, hvussu longu starvstíðin er og at tiltaksumboð eisini verða vald. Eisini heldur nevndin tað vera óheppið, um øll umboðini verða skift út samstundis.

Nevndin setir tí fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins:

Undir broyting 2) verður skotið upp at orða § 38, 2. stk. soljóðandi:
»Landsstýrið velur umboðini og sama tal av tiltaksumboðum fyri eitt 4 ára starvsskeið. Fyri 2 av umboðunum og tiltaksumboðunum, annað umboðandi arbeiðsgevarar, verður 1. starvsskeiðið einans 2 ár. Umboðini kunnu taka við afturvali.«
2. stk. verður til nýtt 3. stk.

under ændring 2) foreslås, at § 38, stk. 2 affattes således:
»Landsstyret vælger repræsentanterne og samme antal af stedfortrædere for en 4 årig funktionsperiode. For 2 af repræsentanterne og stedfortræderne, det ene repræsenterende lønmodtagere og det andet repræsenterende arbejdsgivere, er den første funktionsperiode 2 år. Repræsentanterne kan modtage genvalg.«
Stk. 2. bliver til nyt stk.3.

2. viðgerð 18. mars 1987. Broytingaruppskot frá nevndini til § 1 varð samtykt við 24-0. § 1 soleiðis broytt varð samtykt við 24-0, §§ 2 og 3 samtyktar við 25-0. Við 25-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 24. mars. Málið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j. nr. 1305-12-1.

38. Uppskot til løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað.

Ár 1986, hósdagin 27. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað.

§ 1. Føroya Yrkisskúli fyri fiskaídnað og havbúnað er stovnaður undir landsstýrinum.
2. stk. Eftir avgerð landsstýrisins kunnu deildir av Føroya Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað setast á stovn.

§ 2.
Útbúgvingin skal geva næmingunum almennan og yrkisligan kunnleika og fjølbroytta starvsvenjing, soleiðis at teir gerast førir fyri at virka í og luttaka í menningini av tí føroyska fiskaídnaðinum og havbúnaðinum. Næmingarnir skulu skilja støðið hjá fiskiídnaðinum og havbúnaðinum, sæð í mun til tað føroyska samfelagið og tey náttúruríkidømi, sum fiskaídnaðurin og havbúnaðurin eru treytaðir av. Næmingarnir skulu eisini gjøgnum hesa útbúging fáa møguleika fyri framhaldandi útbúging.

lagtingslov om Færøernes Erhvervsskole for fiskeindustri og akvakultur.

§ 1. Færøernes Erhvervsskole for fiskeindustri og akvakultur er en institution under landsstyret.
Stk. 2. Efter landsstyrets bestemmelse kan der oprettes afdelinger af Færøernes erhvervsskole for fiskeindustri og akvakultur.

§ 2.
Undervisningen skal bibringe eleverne almen og faglig viden og en varieret erhvervspraktik, så at de bliver i stand til at arbejde i og medvirke til udviklingen af den færøske fiskeindustri og akvakultur. Eleverne skal kunne forstå grundlaget for fiskeindustrien og akvakulturen set i forhold til det færøske samfund og de resourcer, som fiskeindustrien og akvakulturen er betinget af. Eleverne skal tillige gennem denne uddannelse få mulighed for videre uddannelse.

§ 3. Fráleran byggir á fráfaringarroynd fólkaskúlans aftan á 9. flokk, og næmingurin skal hava fylt 16 ár fyri at kunna verða upptikin á skúlanum. Næmingar, ið ikki hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans aftan á 9. flokk, kunnu tó verða upptiknir, um teir hava arbeitt nøkur ár í fiskaídnaðinum ella á annan hátt verða mett at vera før fyri at kunna gjøgnumføra útbúgvingina við einum nóg góðum úrsliti.

§ 3. Undervisningen bygger på folkeskolens afgangsprøve efter 9. klasse, og eleven skal være fyldt 16 år for at blive optaget på skolen. Elever, der ikke har folkeskolens afgangsprøve efter 9. klasse, kan dog optages, såfremt de i nogle år har arbejdet i fiskeindustrien eller på anden måde anses for at være i stand til at kunne gennemføre uddannelsen med et tilfredsstillende resultat.

§ 4. Útbúgvingin er 2 ár + starvsvenjingartíð, og hvørt ár endar við einari prógtøku. Umframt tey bæði skúlaárini skulu næmingarnir antin:

a. aftan á 1. skúlaárið gjøgnumganga 10 mánaðir skipaða og skúlastýrda starvsvenjing í fiskaídnaðinum ella havbúnaðinum, ella
b. hava arbeitt í minsta lagi 2 ár í fiskaídnaðinum ella havbúnaðinum. Hetta arbeiðið skal góðkennast av skúlanum.

a) ella b) saman við 1. ársprógvi gevur rætt til at fara upp til eina yrkisroynd, sum gevur yrkisprógv.

§ 4. Uddanelsen varer 2 år + erhvervspraktiktid, og hvert år ender med en eksamen. Foruden de to skoleår skal eleverne enten:

a. efter første skoleår gennemgå 10 måneders tilrettelagt og skoleforstået erhvervspraktik i fiskeindustrien eller akvakulturen, eller
b. have arbejdet i mindst 2 år i fiskeindustrien eller akvakulturen. Dette arbejde skal godkendes af skolen.

a. eller b. sammen med bestået 1. årseksamen giver ret til at tilmelde sig en fagprøve, som giver fagbevis.

§ 5. Frálæran í fiskaídnaðar- og havbúnaðarútbúgvingini fevnir um hesar lærugreinar:

Rokning,
støddfrøði,
teldulæru,
alisfrøði,
evnafrøði,
føroyskt,

§ 5. Undervisningen til fiskeindustri- og akvakulturuddannelsen omfatter følgende fag:

Regning,
matematik,
datalære,
fysik,
kemi,
færøsk,

enskt,
samfelagslæra,
fiskifrøði,
lívfrøði,
smáverulívfrøði,
reinføri,
matvørulæru/-framleiðsla,
tilfarslæra,
maskinlæra,
reiðskapar- og tóllæru,
havlæra
hagfrøði,
marknaðarlæra,
virkisbúskapur,
framleiðslutøkni/fóðurlæra
/sátur/sjúkralæra,
arbeiðsumhvørvi/ergonomi,
yrkisástøði,
starvslæra,
Næmingarnir fáa herumframt lestrar- og yrkisvegleiðing.

2. stk. Um gongdin ger tað neyðugt, kann landsstýrið áseta, at undirvísingin eisini skal fevna um aðrar lærugreinir enn tær, ið eru nevndar í 1. stk., ella at ein ella fleiri teirra fella burtur.

§ 6. Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri:

a. frálæru til fiskaídnaðar- og havbúnaðarprógv, býti millum tær báðar høvuðsdeildirnar, innihaldi og vídd í teimum einstøku lærugreinunum og starvslæruni.
b. prógtøkuhaldi og krøvum í teimum einstøku lærugreinunum til prógtøkurnar,
c. duguameti og prógdømi.

engelsk,
samfundsfag,
fiskeorifag,
biologi,
mikrobiologi,
hygiejne,
fødevare/-produktion,
materialelære,
maskinlære,
regnskabs- og instrumentlære,
havlære,
statistik,
markedslære,
virksomhedsøkonomi,
produktionsteknologi/fødevarelære/slagtning/sygdomslære
arbejdsmiljø/ergonomi,
fagteori,
praktik,
Eleverne modtager desuden studie- og erhvervsvejledning.

Stk. 2. Hvis udviklingen nødvendiggør det, kan landsstyret fastsætte, at undervisningen ogsa skal omfatte andre fag end dem, der er nævnt i stk. 1. eller at et eller flere af disse falder bort.

§ 6. Landsstyret fastsætter nærmere regler for:

a. undervisning til fiskeindustri- og akvakulturteknikumbevis, fordeling mellem de to hovedområder, indhold og omfang i de enkelte fag og praktikken,
b. eksamensafvikling og krav i de enkelte fag til eksaminerne,
c. dueligheds bedømmelse og karaktergivning.

§ 7. Til úthúgvingina hoyra venjingarhøli og starvsstova, har næmingarnir fáa starvslæru og gera starvsstovuroyndir. Samstarv við verandi virkir fest í lag, har næmingarnir herumframt fáa starvsvenjing og kunnleika til viðurskiftini á arbeiðsplássunum.

§ 8. Næmingarnir hava møtiskyldu bæði til ta almennu og ástøðiligu frálæruna, starvsfrálæruna og starvsvenjingina. Um møtiskyldan ikki verður hildin, kunnu næmingarnir verður burturvístir eftir nærri reglum, sum landsskúlafyrisitingin fyrisetir.

§ 9. Landsstýrið setir skúlastjóra eftir tilmæli frá landsskúlaráðnum. Skúlastjórin hevur dagligu leiðsluna um hendi, og stendur landsskúlafyrisitingin til svars fyri frálæruni.
2. stk. Fyri at tryggja, at frálæran á yrkisskúlanum er í samljóð við menningina í vinnuni, verður eitt skúlaráð sett við umboð fyri feløg og stovnar innan virkisøki skúlans. Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri vali av limum og fyri virkisøki og heimildum hjá skúlaráðnum.

§ 10. Skúlamyndugleikarnir seta og loysa úr starvi lærarar eftir tilmæli frá skúlastjóranum.

§ 7. Til uddannelsen hører øvelseslokale og laboratorium, hvor eleverne får praktik og foretager laboratorieøvelser. Der etableres samarbejde med eksisterende virksomheder, hvor eleverne herudover får erhvervspraktik og kendskab til forholdene pa arbejdspladserne.

§ 8. Eleverne har mødepligt både til den almene og teoretiske undervisning, praktikken og erhvervspraktikken. Hvis mødepligten ikke overholdes, kan eleverne bortvises efter nærmere regler, som undervisningsdirektoratet fastsætter.

§ 9. Landsstyret ansætter forstanderen efter indstilling fra undervisningsrådet. Forstanderen forestår den dagligе ledelse og er i forhold til undervisningsdirektoratet ansvarlig for undervisningen.
Stk. 2. For at sikre, at undervisningen og erhvervsskolen er i overensstemmelse med udviklingen i erhvervet, udnævnes et skoleråd sammensat af repræsentanter for organisationer og institutioner indenfor skolens arbejdsområde. Landsstyret fastsætter nærmere regler for valg af medlemmer til skolerådet og for dets arbejdsområde og kompetence.

§ 10. Skolemyndighederne ansætter og afskediger lærere efter instilling fra forstanderen.

§ 11. Til undirvísing í teimum almennu og ástoðiligu lærugreinunum verða lærarar nýttir, sum hava førleika at undirvísa á einum slíkum sti gi, at hesar lærugreinir kunnu verða viðurkendar og góðskrivaðar, um næmingarnir fara til framhaldandi og/ella hægri útbúgving. Til undirvising í yrkisástoði og starvslæru verða lærarar nýttir, sum hava yrkisútbúgving á økjunum, ella fólk, sum starvast í vinnuni. Landsstýrið ásetir gjøllari reglur hesum viðvíkjandi.

2. stk. Setan í fast starv sum lærari er treytað av, at avvarðandi stendur roynd í námsfroði. Landsstýrið ásetir nærri reglur hesum viðvíkjandi.

§ 11. Til undervisning i de almene og teoretiske fag benyttes lærere, som har kompetence til at undervise på et sådant niveau, at disse fag kan anerkendes og overføres, hvis eleverne påbegynder en videregående og/eller højere uddannelse. Til undervisning i fagteori og praktik benyttes lærere, som har uddannelse på områderne, eller personer, der er beskæftiget i erhvervet. Landsstyret fastsætter nærmere regler herom.

Stk. 2. Fastansættelse af lærere er betinget af, at vedkommende består en pædagogisk prøve. Landsstyret fastsætter nærmere regler herom.

§ 12. Landsskúlastjórin skipar fyri prógtøkunum.

2. stk. Til prógtøkuna verða havdar skrivligar, munnligar og starvsligar royndir við prógdómarum, ið verða tilnevndir av landsskúlastjóranum. Tær munnligu og starvsligu royndirnar eru almennar.

3. stk. Til prógtøkurnar skulu næmingarnir prógva, at teir hava ta búning og tann kunnleika, sum er endamálið við frálæruni og upplæringini.

4. stk. Prógv verða latin eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

§ 12. Undervisningdirektøren forestår eksamensafviklingen.

Stk. 2. Eksamen består af skriftlige, mundtlige og praktiske prøver med censorer, der beskikkes af undervisningsdirektøren. De mundtlige og praktiske prøver er offentlige.

Stk. 3. Ved eksamenerne skal eleverne vise, at de er i besiddelse af den modenhed og viden, som er formålet med undervisningen og oplæringen.

Stk. 4. Eksamensbeviser udstedes efter regler, som landsstyret fastsætter.

§ 13. Landsstýrið kann áseta reglur fyri skeiðvirksemi innan fiskaídnað og havbúnað.

§ 13. Landsstyret kan fastsætte regler for kursusvirksomhed inden for fiskeindustri og akvakultur.

§ 14. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1987.

§ 14. Denne lov træder i kraft 1. januar 1987.

Viðmerkingar:

Á uppskoti til fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1987 er undir konto § 14.14661. Skúli fyri fiskaídnað og havbúnað avsettur kr. 1.051.000 til rakstur fyrsta skúlaárið og keyp av útgerð til hendan skúlan, sum eftir ætlan skal byrja virksemi sítt 1. august 1987, tó so at skúlastjórin verður settur fyrst í árinum, so hann kann fyrireika útbúgvingina.

Í skjølunum til nevnda fíggjarløgtingslógaruppskotið, bls. 168-170, er gjølla greitt frá fyrireikingunum til stovnsetingina av hesum skúla, síðani landsskúlastjórin á jóansøku 1982 setti eina nevnd at gera uppskot til útbúgvingar í fiskivinnu, eins og greitt er frá tí ætlaða næminga- og flokkatalinum og tørvinum á hølum og lærarum, og tann samlaða kostnaðarmetingin er nærri útgreinað samsvarandi hesum.

Umframt at vísa til hetta tilfarið vísir landsstýrið til hjálagda skjal 1, sum er tað álitið viðvíkjandi fiskivinnuútbúgving, sum frammanfyri umrøddu nevnd greiddi úr hondum í december 1983, og sum m.a. fevnir um nærri útgreiningar viðvíkjandi skipanini av útbúgvingini, t.e. viðvíkjandi endamáli, upptøkutreytum , bygnaði, skeiðvirksemi, tíma- og lærugreinabýti 1. og 2. skúluárið, yrkisástøði og starvslæru, eftirmeting, yrkisroynd, yrkisprógvi, yrkisbrævi, hølum og útgerð, stýring og lærarum.

Av tí at havbúnaðarparturin av útbúgvingini ikki er viðgjørdur í umrøddu álitið, hevur landsskúlastjórin sett eina nevnd at gera eitt álit um innihaldið í hesum partinum av útbúgvingini.

Eisini leggur landsstýrið við sum skjal 2 eitt yvirlit yvir teir myndugleikar, stovnar, feløg, virkir og onnur, sum landsskúlafyrisitingin í 1983 sendi álitið til, og hvørs viðmerkingar vórðu tiknar til eftirtektar, tá landsskúlafyrisitingin gjørdi tað uppskotið til løgtingslóg fyri Føroya Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað, sum landsstýrið við hesum leggur fyri løgtingið.

SKJAL 1.

Viðmerkingar til løgtingsmál um uppskot til løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað.

Í fíggjarløgtingslógaruppskotinum 1987 undir § 14.14661 verður hesin skúlin røptur: »Skúli fyri fiskiídnað og havbúnað« og á donskum: »Skole for fiskeindustri og havbrug«.

Í uppskotinum til løgtingsmál er heitið: »Føroya Yrkisskúli fyri fiskaídnað og havbúnað« nýtt, tá talan er um ein skúla fyri alt landið, sum kann fáa deildir ymsa staðni eftir avgerð landsstýrisins, smbr. skipanina fyri Føroya Studentaskúla og HF- skeiðið sbrt. løgtingslóg nr. 20 frá 23. apríl 1976.

Í fíggjarløgtingslógaruppskotinum 1987 er heitið á donskum: »Skole for fiskeindustri og havbrug«, men í uppskotinum til løgtingsmál er heitið: »akvakultur« nýtt sum felagsheiti fyri tey donsku heitini: »havbrug« á sjónum og »dambrug« á landi.

Hjá okkum hevur heitið: »havbúnaður« ætlandi fingið eitt innihald, sum gev, at tað fevnir um bæði aling á sjónum og á landi.

Á Landsskrivstovuni 13. oktober 1986.

Inger Christiansen

Skjal 2.

STOVNAR OG FELØG, SUM ÁLITIÐ ER SENT TIL:

Føroya Landsstýri
Landsskútaráðið
16-19 ára nevndin
Sjómansuthúgvingarnevndin
Føroya Lærarafelag
Yrkisfelagið
Føroya Sjómansskúli
Klaksvíkar Sjómansskúli
Klaksvíkar Tekniski Skúli
Føroya Maskinskúli
Tekniski Skúlin í Tórshavn
Handilsskúlin, Tórshavn
Havnar Arbeiðsmannafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag,
Føroya Arbeiðarafelag
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag
Føroya Handverkarafelag
Føroya Handverksmeistarafelag
Føroya Reiðarafelag
Føroya Skipara- og navigatørfelag
Meginfelag Útróðrarmanna
Fiskimannafelagið
Fiskirannsóknarstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Fiskivinnuráðið
Ídnaðarstovan
Projekt »Vestnorden«

FISKAVIRKI:
Bátafisk, Strendur
Norðis, Eiði
Nykur, Tvøroyri
Lynfrost, Runavík
Handils- og frystivirkið, Fuglafjørður
Ísvirkið, Fuglafirði
Frost, Leirvík
Flakavirkið í Vík
Vestmanna Fiskavirki, Vestmanna
Bacalao, Tórshavn
Kósavirkið, Klaksvík
J & O, Klaksvík
Frostvirkið, Norðdepli
Borgin, Sandur
Flakavirkið í Skopun
Polarfrost í Vági
Tvøroyrar Flakavirki
Fisk, Hvalba
Klivar, Nólsoy
Snarfrost, Miðvágur
Vestfisk, Sørvágur
Havsbrún, Fuglafjørður
Bakkafrost, Glyvrar
Harenga, Gøta
Kovin, Miðvágur

SKIPAFELØG:
Felagið Trolskip
Felagið Rækjuskip
Felagið Nótaskip
Felagið Ídnaðarskip

Alitið til skjals at løgtingsskrivstovuni og landsskrivstovuni.

Í viðgerð 12. december. Málið varð beint í skúla- og mentanmálanevndina, sum 8. apríl 1987 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. november 1986 og var eftir 1. viðgerð tann 12. december 1986 beint í mentanar- og skúlanevndina.

Bakgrundin fyri uppskotinum er tann, at landsskúlastjórin í 1982 setti nevnd við tí endamáli at gera uppskot til útbúgvingar innan fiskivinnuna.

Henda nevnd fekk breiða umboðan frá landsumsitingini, yrkisfeløgum og vinnulívinum. Nevndararbeiðið varð liðugt í september 1983, tá nevndin legði fram »Álit viðvíkjandi fiskivinnuútbúgving« (skjal 1 til tingmál nr. 38/86).

Í álitinum varð mælt til at seta á stovn fiskiídnaðarskúla við tí endamáli at geva næmingunum almennan og yrkisligan kunnleika og fjølbroytta starvsliga venjing, soleiðis at teir gerast førir fyri at virka í og luttaka í menningini av tí føroyska fiskiídnaðinum. Eisini skulu teir skilja støði hjá fiskiídnaðinum, sæð í mun til tað føroyska samfelagið og tey náttúruríkidømi, sum hesin ídnaður er treytaður av. Næmingarnir skulu eisini gjøgnum hesa útbúgving fáa møguleiku fyri framhaldandi útbúgving.

Uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað er orða samsvarandi hesum málsetningi.

Tó hevur tann áður umrøddu nevndin ikki viðgjørt havbúnaðarútbúgvinginu, men upplýst verður, at arbeitt verður við hesum spurningi.

Sambært uppskotinum verður talan um 2 ára skúlagongd umframt starvsvenjing, og skal hvørt skúlaárið enda við prógvtøku.

Ætlan landsstýrisins er, at skúlin skal byrja virksemi sítt 1. august 1987, og eru settar av 1.051.000 kr. til rakstur fyrsta skúlaárið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið, men setir fram soljóðandi:

broytingaruppskot

§ 14 verður orðað soleiðis:

»Henda lóg kemur í gildi beinanvegin«.

§ 14 affattes således:

»Denne lov træder i kraft straks«.

2. viðgerð 9. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 26-0 atkvøðum, §§ 2-13 samtyktar við 27-0, § 14 samtykt við 27-0. Við 27-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. apríl. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2137-4-1. Lóg nr. 43 frá 5. mai 1987.

39 Lóg um viðgerðarhjálparar (terapiassistentar).

Ár 1986, hósdagin 27. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at seta í gildi við kongatigari fyriskipan lóg nr. 154 frá 8. mai 1954 um viðgerðarhjálparar.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 8. august 1986 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 154 frá 8. mai 1968 um viðgerðarhjálparar fevnandi um arbeiðsviðgerðarar (ergoterapeutar) og alisviðgerarar (fysioterapeutar) verður lýst at galda í Føroyum.

Landslæknin hevur í skrivi dagfest 2. oktober 1986 mælt til, at umrødda lóg verður sett í gildi.

Málið verður við hesum lagt fyri løgtingið við viðmæli.

+ **skjal A** Uppskot til fyriskipan um gildi fyri Føroyar av lóg um viðgerðarhjálparar.
+ **skjal B** Frágreiðing frá innanríkismálaráðnum um lógina um viðgerðarhjálparar frá 18. januar 1984.
+ **skjal C** Uppskot til fólkatingslóg um viðgerðarhjálparar, sum sett varð fram í fólkatinginum i 1968 við viðmerkingum og álit frá fólkatingsnevndini í málinum.

1. viðgerð 3. december. Málið varð uttan orðaskifti beint í almanna- og heilsunevndina, sum 24. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fyri tingið hin 25. november 1986, har mælt. verður til at seta í gildi við kgl. fyriskipan lóg nr. 154 frá 8. mai 1954 um viðgerðarhjálparar.

Málið snýr seg um löggilding av viðgerðarhjálparum. Viðgerðarhjálparar eru: ergoterapeutar og fysioterapeutar.

Ár 1968 fingu hesir bólkar löggilding frá danska læknafelaginum. Löggilding-

in snýr seg um heitið viðgerðarhjálpari (ergoterapeutur og fysioterapeutur), meðan sjálvt virksemið sum viðgerðarhjálparar eftir lógini ikki fevnir um lóggildugar viðgerðarhjálparar.

Lóggildingin hevur til endamáls at bera so í bandi, at almennir stovnar hava trygd fyri, at úthúgvingin er forsvarlig.

Lógin snýr seg annars eisini um, hvørji rættindi og hvørjar skyldur viðgerðarhjálparar hava.

Eisini eru reglur fyri eftirliti við viðgerðarhjálparum.

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, ið tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mars. Uppskotið varð samtykt við 28-0.

F.L. j.nr. 958-1

40 Broyting í lógunum til sjúkrasystrar

Ár 1986, hósdagin 27. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at seta í gildi við kongaligari fyriskipan hjálagda uppskot til kongaliga fyriskipan um broyting av lógum um sjúkrasystrar.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 8. august 1986 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg fyri Føroyar nr. 127 frá 25. mai 1956 um sjúkrasystrar við seinni broytingum verður broytt samsvarandi hjálagda uppskoti til kongaliga fyriskipan.

Landslæknin hevur í skrivi dagfest 2. oktober 1986 mælt til, at umroddu broytingar verða framdar.

Hjálagd er frágreiðing frá innanríkismálaráðnum um broytingaruppskot dagfest 24. november 1983 og uppskot til kongaliga fyriskipan um broyting av lógini um sjúkrasystrar.

1. viðgerð 3. december. Málið varð uttan orðaskifti beint í almenna- og heilsunevndina, sum 24. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Føroya landsstýri hin 27. november 1986 og aftaná 1. viðgerð beint í almenna- og heilsunevndina.

Talan er um eina dagførslu av reglunum og lóggilding av sjúkrasystrum. Í sjálvari broytingarlógini eru eisini reglur viðvíkjandi EF sjúkrasystrum. Hesar reglur verða ikki mældar til at seta í gildi í Føroyum.

Annars verður gjørt vart við, at eisini sjúkrasystrar hoyra undir felags norðurlanda arbeiðsmarknaða, ið fevnir um læknar, tannlæknar, klinikassistentar, sjúkrasystrar, fysioterapeutar, ergoterapeutar, ljósmammur, heilsusystrar, apotekarar, ratiografar, røktarar, tannrøktarar, labortatoriuteknikkarar og sjúkrahjálparar.

Hesin norðurlandasáttmáli er lagdur fyri tingið av Føroya landsstýri (tingmál nr. 50/1986). Hetta mál er til viðgerðar í socialu nevnd í løtuni.

Tað er ein samd social nevnd, ið mælir til at samtykkja uppskotið frá Føroya landsstýri.

2. viðgerð 27. mars 1987. Uppskot landsstýrisins samtykt við 19-0 atkvøðum.

F. L.j.nr. 1305-12-1.

41 Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Ár 1986, týsdagin 2. december legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir v.m.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1987 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip, fiskavirkir og smolt- og alibrúk, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 15 mió. kr.

§ 2.

Treytirnar, fyri at veðhald kann verða veitt, eru hesar:

1. At líkindi eru til, at raksturin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.
2a. Har talan er um fiskavirkir ella smolt- og alibrúk, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10 % av veðhildna láninum og at fingin verða onnur lán, sum í minsta lagi eru 15 % av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, og sum ikki kunnu krevjast afturgoldin yvir styttri áramál enn áramálið fyri tey lán, landskassin veðheldur fyri. Lands

lagtingslov om garanti for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder m.v.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1987 at garantere for lån til fiskeskibe, fiskerivirksomheder og smolt- og fiskeopdrætsanlæg, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 15 mio. kr.

§ 2.

Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

1. At der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.
2a. Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder eller smolt- og fiskeopdrætningsanlæg, at egenkapitalen forhøjes med mindst 10 % af det garanterede lån og at andre lån tilvejebringes for mindst 15 % af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, og som ikke kan kræves tilbagebetalt over et kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landskassen garanterer i

stýrinum er í serligum førum, har talan er um fiskavirki á smáplássi, heimilað at víkja frá regluni um 15 % kravið.

2b. Har talan er um fiskiskip, har partafelag er ognari, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10 % av veðhildna láninum.

2c. Har talan er um fiskiskip, har einstaklingar, partsreiðarar ella líknandi eru ognarar, at inngoldið er í minsta lagi út yvir kravda eginpening spardur skattur, sum stavar frá avskriving upp á skipið skattaárini 1982/83, 1983/84, 1984, 1985 og 1986 og at nýinngoldin verða 10 % av veðhildna láninum.

henhold til denne lov. Hvor der er tale om fiskerivirksomhed på småpladser bemyndiges landsstyret til under særlige omstændigheder at fravige kravet om 15 %.

2b. Hvor der er tale om fiskeskibe, der tilhører et aktieselskab, at egenkapitalen forhøjes med mindst 10 % af det garanterede lån.

2c. Hvor der er tale om fiskeskibe, hvor enkeltpersoner, partsredere eller lignende er ejere, at der er indbetalt ud over den krævede egenkapital mindst sparet skat, som stammer fra afskrivning på skibet skatteårene 1982/83, 1983/84, 1984, 1985 og 1986, og at nyindbetalt bliver 10 % af det garanterede lån.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1987

§ 3.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1987.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 4 frá 9. januar 1986 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, tey sonevndu kreppulánini, jbr. løgtingslóg nr. 22/1985, er lógin galdandi í fíggjarárinum 1986.

Tilsagnir eftir hesi lóg eru givnar fyri um 13 mió. kr.

1. viðgerð 10. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 29. januar 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1986 og eftir 1. viðgerð tann 10. í sama mánað beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 3. februar 1987. § 1 varð samtykt við 29-0, §§ 2 og 3 við 29-0. Við 29-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. februar. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F. L. j.nr. 1413-5-1. Lóg nr. 13 frá 27. februar 1987.

42 Broyting í læknalógini

Ár 1986, hósdagin 27. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til, at hjálagda uppskot til konga liga fyriskipan um broyting í fyriskipan fyri Føroyar um læknayrkið verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfestum 8. august 1986 sett heimastýrinum fyrispurning, um tað hevur nakað at viðmerkja til, at læknalógin í Føroyum verður broytt sambært hesum uppskoti frá innanríkismálaráðnum 14. juli 1986.

Fyriskipanin fyri Føroyar um læknayrkið er síðst broytt við kongaligari fyriskipan nr. 346 frá 21. september 1956.

Ætlanin við uppskotinum er at seta tær síðstu broytingarnar í læknalógini í gildi í Føroyum.

Talan er um hesar lógir:
— lóg nr. 213 frá 4. juni 1965 um broytingar í ymiskum reglum um revsing, upptøku v.m., § 70
— lóg nr. 174 frá 29. apríl 1970 um broyting av lóg um læknayrkið og
— lóg nr. 275 frá 26. mai 1976 um broyting av lóg um læknayrkið.

Broytingarnar eru serliga í reglunum í læknalógini um verkligu viðari útbúgvingini av læknum. Við lógarbroytingini í 1976 er soleiðis gjørd ein felags almenn grundútbúgving í 18 mánaðir fyri allar læknar. Eisini verður ein framhaldsútbúgving innan tær einstøku læknaligu sergreinirnar løgd til rættis. Sum hjá serlæknunum verða nú sett krøv um viðari útbúgving fyri at kunna arbeiða sum almennt settur læknir. Skotið verður upp, at kommunulæknar, sum verða settir í starv í Føroyum, eftir at tær broyttu reglurnar eru settar í gildi fyri Føroyar, skulu lúka somu útbúgvingarligu krøvini sum almennt settu læknarnir.

Annars er talan um eina nútíðargerð av fyriskipanini sambært teim lógarbroytingum, sum eru settar í gildi.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til uppskot innanríkismálaráðsins um broyting í fyriskipan fyri Føroyar um læknayrkið.

+ **skjal A.** Uppskot til kongaliga fyriskipan um broyting í fyriskipan fyri Føroyar um læknayrkið.

+ **skjal B.** Orðaljóði av allari læknalógini um broytingaruppskotið verður samtykt.

1. viðgerð 3. december. Málið varð uttan orðaskifti beint í almanna- og heilsunevndina, sum 24. mars 1987 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av Føroya landstýri, ið mælir til broyting um fyriskipan fyri Føroyar um læknayrkið.

Fyriskipanin fyri Føroyar um læknayrkið er seinast broytt hin 21. sept. 1976. Ætlanin við uppskotinum er at seta í verk tær seinastu broytingarnar í læknalógini. Talan er bæði um reglurnar fyri grundútbúgving eins og um serlæknaútbúgvingina. Eisini kemur hetta at føra við sær, at kommunulæknar, sum verða settir í starv í Føroyum, hava víðari útbúgving og skulu lúka somu útbúgvingarligu krøvini sum almennt settu læknarnir. Annars er eisini talan um eina nútíðargerð av fyriskipanini og av sjálvum lógartekstinum.

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, ið tekur undir við uppskotinum frá Føroya landsstýri.

2. viðgerð 26. mars. Uppskotið samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 913-14-5

43 Broyting í filmseftirlitslógini

Ár 1986, hósdagin 27. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um filmseftirlit.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 92 frá 4. oktober 1984 um filmseftirlit verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, 2. stk. verður aftan á talið »18« sett: », 16«.
2) Í § 3, 4. stk., verður aftan á »18 ár« sett: », 16 ár«.
3) Í § 4, nr. 3, verður aftan á »18 ár« sett: », 16 ár«.
4) Sum nýtt nr. 4 verður innsett: »at filmurin bert má vísast fyri fólki yvir 16 ár.«
   Núverandi nr. 4 og 5 verða hereftir ávíkavist nr. 5 og nr. 6.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslog om ændringer i lagtingslov om filmscensur.

§ 1.

I lagtingslov nr. 92 af 4. oktober 1984 om filmscensur foretages følgende ændringer:

1) I § 3, stk. 2, tilføjes efter tallet »18[mil: », 16«.
2) I § 3, stk. 4, tilføjes efter »18 år«: », 16 år«.
3) I § 4, nr. 3, tilføjes efter »18 år«: », 16 år«.
4) Som nyt nr. 4 indsættes: »at filmen kun må forevises for personer over 16 år.«
   Nuværende nr. 4 og 5 bliver herefter henholdsvis nr. 5 og nr. 6.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Lógin um filmseftirlit, sum er galdandi bæði fyri biograffilmar og videofilmar, kom í gildi fyri tveimum árum síðani.

Filmseftirlitið metir, við teimum reyndum tað hevur fingið nú í tvey ár at hava umsitið nýggju lógina, at tað við tí filmsútboði, sum er í dag, er alt ov langt ímillum aldursmørkini 12 og 18 ár.

Teir nógvu av teimum sonevndu ungdómsfilmunum fáa, sum er, eftir teirra meting ikki rætta aldursmarkið, men liggja ofta millum galdandi aldursmørk, sum eru 12 og 18 ár.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum frá Filmseftirlitinum um at seta eitt

aldursmark aftur at upp á 16 ár og setir fram uppskot um broytingar í lógini samsvarandi hesum.

1. viðgerð 2. december. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

landsstýrið legði málið fram hin 27. november 1986. Málið varð beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Í mun til galdandi løgtingslóg nr. 92 frá 4. oktober 1984 um filmseftirlit er høvuðsbroytingin eftir uppskotinum, at bæði fyri biograffilmar og sjónbandsfilmar millum galdandi 12 ára og 18 ára aldursmarkið verður sett eitt 16 ára aldursmark. Hesa broyting hevur filmseftirlitið mælt til eftir tvey ára royndir við lógini frá 1984; bildið verður, at nógvir av teimum sonevndu ungdómsfilmunum, sum í dag eru á marknaðinum av rættum eiga at liggja ímillum 12 ára og 18 ára aldursmarkið, og at verandi glopp millum hesi bæði aldursmørk er ov langt. Landsstýrið er samt við Filmseftirlitinum í hesi meting og hevur tí lagt uppskotið fram.

Rættarnevndin er samd við landsstýrið og filmseftirlitið í, at ov langt er ímillum 12 ára og 18 ára aldursmørkini, serliga tá ið havdur verður í huga tann stóri vøkstur í framboðinum á sjónbandsmarknaðinum, og at bóskandi og rætt er ímillum hesi mørk at seta eitt 16 ára mark. Nevndin mælir tí til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mars 1987. § 1 varð samtykt við 27-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 26-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 27. mars. Málið endaliga samtykt við 18-1 atkvøðum.

F.L. j.nr. 513-18-2. Lóg nr. 60 frá 8. mai 1987.

44 Sáttmáli um vernd av ferðandi villum djórasløgum (Bonn-sáttmálin).

Ár 1986, týsdagin 2. december legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at »sáttmáli um vernd av ferðandi villum djórasløgum« (Bonn-sáttmálin) verður lýstur at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur við skrivi, dagfest 11. oktober 1985, spurt, um sáttmálin um vernd av ferðandi villum djórasløgum kann lýsast í Føroyum.

Endamálið við sáttmálanum er at verja ferðandi dýr.

Sáttmálin fevnir ikki um dýr, sum ikki frammanundan — eru friðað í Føroyum (t.d. bláhvalur, kúluboka, fiskiørn, sandgrælingur smb. lista 1 og 2 í sáttmálanum).

Málið hevur verið til ummælis hjá Fiskirannsóknarstovuni, Yvirfriðingarnevndini og Náttúrugripasavninum, og hesir stovnar hava mælt til, at sáttmálin verður lýstur at galda í Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við tilmæli um, at sáttmálin verður lýstur at galda í Føroyum.

Sí skjal 8

1. viðgerð 11. december. Atkvætt varð um, at málið skuldi beinast í rættarnevndina, hetta fall við 8 atkvøðum. Málið varð síðani beint í landbúnaðarnevndina, sum 4. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fram av landsstýrinum 26. november 1986 og við fyrstu viðgerð tann 11. november 1986 beint í landbúnaðarnevndina.

Landbúnaðarnevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Dorethe Blok frá Náttúrugripasavninum og Julionnu Klett, fulltrúa, sum hevur lagt málið til rættis.

Endamálið við sáttmálanum er at verja ferðandi dýr, og hesin sáttmáli fevnir ikki um dýr, sum ikki frammanundan eru friðað í Føroyum.

Nevndin hevur fingið juridiska upplýsing um, at hesin Bonn-sáttmálin ikki kann áleggja okkum eina friðing av dýrum, t.d. grindahvali uttan góðkenning av føroyingum.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 10. mars 1987. Uppskotið varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2207-5-2.

45 Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn veiðimanna.

Ár 1986, hósdagin 27. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn veiðimanna við seinni broytingum.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskernes sikringsfond med senere ændringer.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 7. juni 1979 um trygdargrunn veiðimanna við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í lógaryvirskriftini verða orðini »trygdargrunn veiðimanna« broytt til: »trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir á fiskavirkjum«.

§ 1.

I lagtingslov nr. 49 af 7. juni 1979 om fiskernes sikringsfond foretages følgende ændringer:

1) I lovens overskrift ændres »fiskernes sikringsfond« til: »sikringsfond for fiskeindhandling og løn på fiskevirksomheder«.

2) I § 1, 1. stk. verður »flakavirkir« broyft til »fiskavirkir«.
3) Sum nýtt 3. stk. í § 1 verður innsett: Grunnurin skal somuleiðis tryggja løntakarum, sum starvast á føroyskum fiskavirkjum, avrokning av vunnari løn.«
4) § 3, 1. stk. verður orðað soleiðis: »Fiskavirkini rinda grunninum árliga 3 kr. pr. tons av innvegaðu ráfiskanøgdini. Gjaldið skal verða goldið í seinasta lagi 31. januar árið eftir og kann innheintast við panting.«
5) § 4, 2. stk. verður orðað soleiðis: »Grunnurin kann rinda fiskimonnum, bátaeigarum og løntakarum, sum starvast á fiskavirkjum, forskot upp á krøv teirra í likvidatións- og konkursbúgvum.«
6) Sum nýggj § 7a verður sett: »Landsstýrið ásetir í kunngerð, hvørji sløg av virkjum koma undir hesa lóg.«

2) I § 1, stk. 1 ændres »fiskefilevirksomheder« til: »fiskevirksomheder«.
3) Som ny § 1, stk. 3 indsættes: »Fonden skal ligeledes sikre lønmodtagere, ansat på færøske fiskevirksomheder, afregning af optjent løn.«
4) § 3, stk. 1 affattes således: »Fiskevirksomhederne betaler til fonden årlig 3 kr. pr. ton af indvejet råfiskemængde. Afgiften skal betales senest 31. januar året efter. Kravet kan inddrives ved udpantning.«
5) § 4, stk. 2 affattes således: »Fonden kan betale fiskere, bådejere og lønmodtagere, ansat på fiskevirksomheder, forskud på deres krav i likvidations- og konkursboer.«
6) Som ny § 7a indsættes: »Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse, hvilke slags virksomheder omfattes af denne lov.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

2. stk. Broyting 3) (§, 3. stk.) er galdandi fyri løn, forvunnin aftan á 1. januar 1987.

3. stk. Broyting 4) (§ 3, 1. stk.) er galdandi fyri ráfisk, avreiddan aftan á 1. januar 1987.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Stk. 2. Ændring 3) (§ 1, stk. 3) er gældende for løn, indtjent efter 1. januar 1987.

Stk. 3. Ændring 4) (§ 3, stk. 1) er gældende for råfisk, indhandlet efter 1. januar 1987.

Viðmerkingar:

Trygdargrunnur Veiðimanna varð skipaður við løgtingslóg nr. 49 frá 7. juni 1979.

Um veiðifør og fiskimenn missa pening í sambandi við, at virki ella fiskakeyparari fer av knóranum, endurrindar trygdargrunnurin førum og manningum 90% av tapinum. Grunnurin fær sínar inntøkur á tann hátt, at øll virki og allir fiskakeyparar rinda grunninum 2 kr. fyri hvørt tons av ráfiski, teir keypa, og

síðan setir løgtingið hvørt ár eina upphædd á figgjarlógina, ið svarar til tað sama, sum virkir og fiskakeyparar rinda inn í grunnin.

Í sambandi við at virkir og arbeiðsgevarar fara av knóranum, eru løntakarar á landi eisini í vanda fyri at missa løn, sum teir eiga til góðar.

Sum er umfatar trygdargrunnurin ikki hesar og onnur trygdarskipan er heldur ikki fyri hetta øki. Hjálagda uppskot til broyting ber í sær, at eisini tey, sum starvast á fiskavirkjum, koma undir lógina, og sostatt fáa tey trygd fyri 90% av lønini.

Tá broytingin kann viðføra meiraútreiðslur fyri grunnin, heldur landsstýrið tað vera rættast, at gjaldið, sum virkir og fiskakeyparar skulu rinda grunninum hækkar úr 2 kr. pr. tons til 3 kr. pr. tons av innvegaðu ráfiskanøgdini. Hetta gjaldið saman við landskassans parti hækkar inntøku grunsins við 50% árliga. Við ráfiskanøgdini fyri 1985 sum grundarlag, verða samlaðu inngjøldini í grunnin mett til umleið kr. 700.000 um árið.

Tann 1. november 1986 var ognin hjá grunninum 3.000.410 kr. Í 1986 hevur grunnurin í einum føri veitt endurgjald í samband við, at eitt virki fór í likvidatión. Endurgjaldið var tilsamans kr. 250.662,77.

Í 1985 hevði grunnurin eitt rakstraravlop upp á kr. 816.738,66. Stuðulin á figgjarlógini gav kr. 267.530,00, gjaldið frá virkjum og fiskakeyparum gav kr. 263.238,00, og rentuinntøkurnar vóru kr. 288.970,66.

Í uppskotinum verður mælt til at broyta heitið flakavirkir til fiskavirkir, og somuleiðis verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild til at taka avgerð um, hvørji virki koma undir lógina, um ivi stendst um tað.

Annars arbeiðir landsstýrið við at gera uppskot til lóg um annan trygdargrunn. Hesin skal umfata aðrar løntakarar á landi. Nevnda uppskot verður væntandi lagt fyri tingið seinni í hesi tingsetuni.

1. viðgerð 3. december 1986. Málið varð beint í arbeiðarumálanevndina, sum 29. januar 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 27. november 1986 og undir 1. viðgerð tann 3. december 1986 beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Øssur av Steinum, Jørgen Thomsen, Sverre Midjord og Ivan Johannesen) kann eftir viðgerðina taka undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til eina minni broyting og setir tí fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins:

Pkt. 6 í § 1 verður orðað soleiðis

»6) Sum nýggj § 7a verður sett:
»Landsstýrið tekur avgerð í ivamálum, hvørji virki koma undir hesa lóg.««

Pkt. 6 i § 1 affattes således:

»6) Som ny § 7a indsættes:
»Landsstyret bestemmer i tvivlstilfælde, hvilke virksomheder omfattes af denne lov.««

Minnilutin (Jógvan Sundstein) hevur ta uppfatan, at ein trygdargrunnur, sum skal tryggja lønarágóðan í konkursbúgvum og líknandi skal umfata øll virki og allar løntakarar í privatu vinnuni. Tað er tí ikki rætt at blanda veiðumenn (råvøruleverandørar) saman við løntakarar. Heldur ikki er tað rætt bert at taka fiskavirkini við, meðan øll onnur virkir verða hildin uttanfyri. Tað hendir tíverri meiri enn so, at bæði iðnaðarvirkir, handlar, skipasmiðjur, byggivirkir, reiðaravirkir og onnur fara konkurs ella í líkvidatión, og lønarágóði verður mistur.

Bert tá ið tað snýr seg um hýruágóða, er lønin tryggjað, tí hon hevur sjópant. Men eisini í hesum føri eigur áognin at vera við í einum tiltaki sum trygdargrunni løntakaranna, tí tað kann taka langa tíð, áðrenn sjópantið verður útgoldið.

Áskoðan minnilutans er tí tann, at trygdargrunnur veiðimanna eigur at vera, sum hann er, meðan ein annar »Trygdargrunnur løntakarannaa verður stovnsettur og skal veita trygd fyri lønarágóða hjá øllum virkjum í vinnulivinum. Grunnurin skal eisini virka skjótt, soleiðis at hann kann leggja peningin út, og so yvirtaka kravið mótvegis tí búgvi, sum skyldar peningin, herundir eisini trygdargrunn veiðumanna, um lagt verður út til fiskimenn við skipum, sum avreiða til flakavirki.

Umsitingin av einum slíkum grunni kann fara fram á einum stovni, sum frammanundan hevur við allar arbeiðsgevarar at gera, til dømis á Vanlukkutryggingini. Fyri at tryggja sær, at allir arbeiðsgevarar koma undir uppkrevjing av gjaldinum til grunnin, kann Vanlukkutryggingin fáa yvirlit frá Líkningarráðnum yvir øll arbeiðsgevaratøl. Ansast skal tó eftir, at bert privati arbeiðsmarknaðurin er við, tí almennir stovnar skulu ikki umfatast av skipanini.

Tørført er at siga nágreiniligt, hvat ein slíkur grunnur hevur fyri neyðini av peningi, men haldast má, at um hann fær einar 2-3 mió. kr. árliga kann hann undir normalum umstøðum røkja sínar skyldur. Tað verður tí hildið rímuligt, at arbeiðsgevaragjaldið verður sett til eitt promillu av útgoldnu lønini árið fyri

uppkrevjingarárið. Hendа upphædd man vera 1-1,5 mió. kr. Landskassin rindar síðan somu upphædd til grunnin.

Uppkrevjingin eigur at fara fram í byrjanini av einum álmanakkaári, aftaná at likningarvaldið hevur gjørt upp samlaðu lønarútgjaldingarnar fyri árið frammanundan. Hesar uppgerðir verða nú gjørdar av líkningarvaldinum og nýtist tí ikki at bíða eftir, at arbeiðsgevarin sjálvur hevur gjørt tað upp.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) setir tí fram uppskot, sum kemur í staðin fyri uppskot landsstýrisins:

Uppskot

til

løgtingslóg um trygdargrunn løntakaranna.

§ 1.

Settur verður á stovn grunnur til at tryggja føroyskum løntakarum á privata arbeiðsmarknaðinum krav eftir ikki útgoldnari løn undir hesum umstøðum:

1. Tá arbeiðsplássið fer konkurs,
2. tá arbeiðsgevari doyr, og búgvið verður skift í rættinum,
3. tá virki letur aftur, og arbeiðsgevarin prógfast eftir rættarúrskurð ikki er førur fyri at rinda lønarkravið.

§ 2.

Treytir fyri at fáa pening úr grunninum eru:
at kravið er uppiborið sambært lógini,
at kravið úrslitaleyst er roynt inukravt við rættsligari incasso,
at kravið er ikki avoldað,
at eingin onnur trygging er galdandi.

§ 3.

Arbeiðsgevarar rinda grunninum árliga 1 promillu av samlaðu lønútgjaldini hvørt álmanakkaárið. Gjaldið skal verða goldið í seinasta lagi 31. mars

lagtingslov om lønmodtagernes sikringsfond.

§ 1.

Der etableres et fond til sikring af færøske lønmodtagere på det private arbejdsmarked krav på ikke udbetalt løn under disse forhold:

1. Når arbejdsstedet går konkurs,
2. når arbejdsgiveren dør, og boet skiftes af skifteretten,
3. når virksomheden lukker, og arbejdsgiveren beviser med retskendelse, at han ikke er i stand til at honorere lønkravet.

§ 2.

Det er en betingelse for at få beløb fra fondet:
at kravet er lovmedholdeligt,
at kravet uden resultat er forsøgt indrevet med retslig incasso,
at kravet ikke er forældet,
at kravet ikke er sikret på anden måde.

§ 3.

Arbejdsgiverne betaler til fondet 1 promille af den samlede lønudbetaling hvert kalenderår. Beløbet skal være betalt ikke senere end 31. marts

árið eftir og kann innheintast við panting.
2. stk. Landskassin veitir grunninum somu upphædd.

det følgende år og kan indhentes ved udpantning.
Stk. 2. Landskassen betaler samme beløb til fondet.

§ 4.

Vanlukkutryggingin umsitir grunnin og virkar móttakaranna vegna undir rættarviðgerð av trotabúgvi.

§ 4.

Vanlukkutryggingin administrerer og fungerer på modtagernes vegne under skifterettens behandling og konkursloven.

§ 5.

Grunnurin rindar í mesta lagi 90 % av kravinum.
2. stk. Grunnurin kann rinda løntakaranum forskot upp á krøv teirra í trotabúgvum v.m.

§ 5.

Fondet betaler højst 90 % af kravet.
Stk. 2. Fondet kan betale lønmodtagerne forskud på krav i konkursboet m.v.

§ 6.

Roknskaparárið er fíggjarárið, og roknskapur grunsins verður grannskoðaður eftir somu reglum sum roknskapur landsins.

§ 6.

Regnskabsåret er finansåret, fondets regnskaber revideres efter de regler, som gælder for landets regnskaber.

§ 7.

Almennir myndugleikar, arbeiðsgevarar og yrkisfeløg skulu eftir ynski geva grunninum upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðir um útgjalding úr grunninum.

§ 7.

Offentlige myndigheder, arbejdsgivere og erhvervsvirksomheder skal efter begæring give fondet de oplysninger, der har betydning for afgørelser om udbetaling fra fondet.

§ 8.

Ósemjur millum arbeiðsgevara, búgv hansara og grunnin kunnu leggjast fyri gerðarrætt, um ósemja tekur seg upp millum partarnar.

§ 8.

Tvistigheder mellem arbejdsgiver, dennes bo og fondet kan forlægges en voldgift, såfremt uoverensstemmelser opstår mellem parterne.

§ 9.

Landsstýrið ger reglugerð fyri umsitingina av grunninum, uppkrevjingarhátt v.m.

§ 9.

Landsstyret udfærdiger vedtægter angående fondets administration, opkrævningsform m.v.

§ 10.

Uppkrevjing til grunnin fer fyrstu ferð fram í byrjanini av 1987 við grundarlagi í lønargjaldingum arbeiðsgevaranna 1986.

§ 11.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 10.

Opkrævning til fondet sker første gang i begyndelsen af 1987 på grundlag af arbejdsgivernes lønudbetalinger i 1986.

§ 11.

Denne lov træder i kraft straks.

13. apríl legði arbeiðsmálanevndin fram soljóðandi:

Álit II

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 27. november 1986 og undir 1. viðgerð tann 3. december 1986 beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Øssur av Steinum, Jørgen Thomsen, Sverre Midjord og Ivan Johannesen) tók aftaná viðgerðina undir við uppskoti landsstýrisins við eini minni broyting.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) setti fram sítt egna uppskot um løgtingslóg um trygdargrunn løntakaranna.

Álitið varð lagt fram 29. januar 1987, men afturtikið til nýggja gjøllari viðgerð.

Løntakarafeløgini hava bæði við brøvum og á fundum við arbeiðaramálanevndina gjørt henni greitt, at tey ynskja trygdargrunnin at fevna um allar løntakarar, meðan uppskot landsstýrisins fevnir um arbeiðsfólkið á flaka- og fiskavirkjum.

Eftir uppskoti landstýrisins skal Lønjavningargrunnurin umsita grunnin. Hetta letur seg væl gera uttan nakrar broytingar á Lønjavningargrunninum.

Meirilutin (Øssur av Steinum, Jørgen Thomsen, Sverri Midjord og Ivan Johannesen) kann, eftir at hava viðgjørt málið av nýggjum, framvegis taka undir við uppskoti landstýrisins, men mælir til eina minni broyting og setir tí fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins:

Pkt. 6 í § 1 verður orðað soleiðis:

»6) Sum nýggj § 7a verður sett:
»Landsstýrið tekur avgerð í ivamálum, hvørji virki koma undir hesa lóg.« —

I § 1 affattes pkt. 6 således:

»6) Som ny § 7a indsættes:
»Landsstyret bestemmer i tvivlstilfælde, hvilke virksomheder omfattes af denne lov.« —

Meirilutin er samdur í, at settur eigur at verða á stovn trygdargrunnur, sum fevnir um allar løntakarar.

Meirilutin ásannar tó, at umsitingin av einum slíkum grunni enn ikki er klár og setir ti fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um trygdargrunn løntakararanna.

§ 1.

Stovnaður verður grunnur við ti endamáli at tryggja føroyskum løntakarum ikki útgoldna lønágóða teirra í sambandi við:

a) at búgv arbeiðsgevarans verður tikið til konkursviðgerðar,
b) arbeiðsgevarin doyr og búgvið verður tikið til viðgerðar av skiftirættinum,
c) tá arbeiðsgevari leggur niður virkið sítt, og tað prógvast við rættarskurði og úttøku til fánýtis vísir seg, at hann ikki er førur fyri at rinda lønarágóða.

lagtingslov om lønmodtagernes sikringsfond.

§ 1.

Der etableres et fond med det formål at sikre færøske lønmodtagere ikke udbetalt løn i forbindelse med:

a) når arbejdsgiverens bo tages under konkursbehandling,
b) når arbejdsgiveren dør og boet tages under behandling af skifteretten,
c) når virksomheden lukker og arbejdsgiveren beviser med retskendelse og med arrest uden resultat, at han ikke er i stand til at honorere lønkravet.

§ 2.

Fyri at løntakari skal kunna krevja, at grunnurin rindar lønarágóða hansara, skulu hesar treytir verða uppfyltar:

a) kravið hevur rættargildið,

b) roynt hevur verið til fánýtis at krevja inn peningin við rættsligari innheinting,

c) kravið er ikki fyrnt,

d) kravið er ikki tryggjað á annan hátt.

§ 2.

For at en lønmodtager skal kunne kræve, at fondet betaler hans lønkrav, skal følgende betingelser være opfyldt:

a) at kravet er lovmedholdeligt,

b) at kravet uden resultat er forsøgt inddrevet med retslig inkasso,

c) at kravet ikke er forældet,

d) at kravet ikke er sikret på anden måde.

§ 3.

Stovnsfæ grunnsins verður fingið til vega við at allir føroyskir arbeiðsgevarar árliga rinda inn í grunnin 1 0/00 av tí samlaðu lønútgjaldingini fyri hvørt ár.

2. stk. Nevnda gjald verður goldið grunninum áðrenn 1. apríl árið eftir, og kann hetta krav krevjast inn við panting.

3. stk. Landskassin rindar árliga inn í grunnin eina samsvarandi upphædd.

§ 3.

Fondets grundkapital skaffes på den måde, at samtlige færøske arbejdsgivere hvert år indbetaler i fondet 1 promille af den samlede lønudbetaling.

Stk. 2. Nævnte betaling skal være foretaget ind i fondet inden 1. april året efter, og dette krav kan indhentes ved udpantning.

Stk. 3. Landskassen indbetaler årligt ind til fondet et tilsvarende beløb.

§ 4.

Grunnurin rindar í mesta lagi 90 % av lønarágóðanum. Í samband við viðgerð av trotabúgvi, deyðsbúgvi ella har sjómaður, sum ikki er fevndur av trygdargrunni veiðimanna, ikki fær sjóveðtryggjaða hýruágóða sín, kann grunnurin, har tørvur er á tí, gjalda út løntakaranum forskot.

2. stk. Í slíkum førum tekur grunnurin yvir rættindini hjá løntakaranum mótvegis trotabúnum, deyðsbúnum ella reiðarínum.

§ 4.

Fondet betaler højst 90 % af lønkravet. I forbindelse med konkursbehandling, dødsbobehandling eller i det tilfælde hvor en sømand, der ikke omfattes af fiskernes garantifond, ikke erhverver sin søpantesikrede hyre, kan fondet, i det omfang der er behov for det, udbetale et forskud til lønmodtageren.

Stk. 2. I sådanne tilfælde overtager fondet lønmodtagerens rettigheder overfor konkursboet, dødsboet eller rederiet.

§ 5.

Grunnurin verður stýrdur av eini 3-mannanevnd, har Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 1 lim, løntakarafeløgini velja 1 lim og triðji limurin verður valdur av Føroya Landsstýri

§ 5.

Fondet administreres af et tremands udvalg, hvor Føroya Arbeidsgevarafelag vælger 1 medlem, lønmodtagerforeningerne vælger 1 medlem og det tredie medlem vælges af Færøernes landsstyre.

§ 6.

Roknskaparár grunsins er álmanakkaárið, og roknskapurin verður grannskoðaður eftir teimum reglum, sum galdandi eru fyri roknskap landsins.

§ 6.

Fondets regnskabsår er kalenderåret, og regnskabet revideres i henhold til de bestemmelser, der er gældende for landskassens regnskab.

§ 7.

Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri um virki grunsins froknað uppkrevjingarhátt o.a.

§ 7.

Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler for fondets virksomhed, heri iregnet opkrævningsform m.v.

§ 8.

Arbeiðsgevarar, yrkisfeløg og almennir stovnar hava skyldu til at geva grunninum allar upplýsingar, sum hava týdning í sambandi við avgerðir um útgjalding v.m.

§ 8.

Arbejdsgivere, fagforeninger og offentlige institutioner har pligt til at meddele fondet alle oplysninger, der er af betydning i forbindelse med beslutninger om udbetaling m.v.

§ 9.

Uppkrevjing av gjøldunum til grunnin fer fram fyrstu ferð 1. januar 1988.

§ 9.

Opkrævninger af betalinger til fondet sker første gang den 1. januar 1988.

§ 10.

Landsstýrið setir nærri reglur fyri, hvussu henda lóg skal verða framd.

§ 10.

Landsstyret fastsætter nærmere regler for, hvordan denne lov administreres.

§ 11.

Nær henda lóg fær gildi, verður ásett við kunngerð frá Føroya Landsstýri.

§ 11.

Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse datoen for denne lovs ikrafttræden.

Minnilutin (Dánjal P. Danielsen) hevur ta uppfatan, at ein trygdargrunnur, sum skal tryggja lønarágóðan í konkursbúgvum og líknandi skal umfata øll virki og allar løntakarar í privatu vinnuni. Tað er tí ikki rætt at blanda veiðumenn (rávøruleverandørar) saman við løntakarar. Heldur ikki er tað rætt bert at taka fiskavirkini við, meðan øll onnur virkir verða hildin uttanfyri. Tað hendir tíverri meiri enn so, at bæði iðnaðarvirkir, handlar, skipasmiðjur, byggivirkir, reiðaravirkir og onnur fara konkurs ella í likvidatión, og lønarágóði verður mistur.

Bert tá ið tað snýr seg um hýruágóða, er lønin tryggjað, tí hon hevur sjópant. Men eisini í hesum føri eigur áognin at vera við í einum tiltaki sum trygdargrunni løntakaranna, tí tað kann taka langa tíð, áðrenn sjópantið verður útgoldið.

Áskoðan minnilutans er tí tann, at trygdargrunnur veiðimanna eigur at vera, sum hann er, meðan ein annar »Trygdargrunnur løntakaranna« verður stovnsettur og skal veita trygd fyri lønarágóða hjá øllum virkjum í vinnulívinum. Grunnurin skal eisini virka skjótt, soleiðis at hann kann leggja peningin út, og so yvirtaka kravið mótvegis tí búgvi, sum skyldur peningin, herundir eisini trygdargrunn veiðumanna, um lagt verður út til fiskimenn við skipum, sum avreiða til flakavirki.

Umsitingin av einum slíkum grunni kann fura fram á einum stovni, sum frammanundan hevur við allar arbeiðsgevarar at gera, til dømis á Vanlukkutryggingini. Fyri at tryggja sær, at allir arbeiðsgevarar koma undir uppkrevjing av gjaldinum til grunnin, kann Vanlukkutryggingin fáa yvirlit frá Líkingarráðnum yvir øll arbeiðsgevaratøl. Ansast skal tó eftir, at bert privati arbeiðsmarknaðurin er við, tí almennir stovnar skulu ikki umfatast av skipanini.

Torført er at siga nágreiniligt, hvat ein slíkur grunnur hevur fyri neyðini av peningi, men haldast má, at um hann fær einar 2-3 mió. kr. árliga, kann hann undir normalum umstøðum røkja sínar skyldur. Tað verður tí hildið ímuligt, at arbeiðsgevaragjaldið verður sett til eitt promillu av útgoldnu lønini árið fyri uppkrevjingarárið. Henda upphædd man vera 1-1,5 mió kr. Landskassin rindar síðan somu upphædd til grunnin.

Uppkrevjingin eigur at fara fram í byrjanini av einum álmanakkaári, aftaná at líkingarvaldið hevur gjørt upp samlaðu lønarútgjaldingarnar fyri árið frammanundan. Hesar uppgerðir verða nú gjørdar av líkingarvaldinum og nýtist tí ikki at bíða eftir, at arbeiðsgevarin sjálvur hevur gjørt tað upp.

Minnilutin (Dánjal P. Danielsen) setir tí fram hetta uppskot, sum kemur í staðin fyri uppskot landsstýrisins:

Uppskot

til

løgtingslóg um trygdargrunn løntakaranna.

§ 1.

Settur verður á stovn grunnur til at tryggja føroyskum løntakarum á privata arbeiðsmarknaðinum krav eftir ikki útgoldnari løn undir hesum umstøðum:

1. Tá arbeiðsplássið fer konkurs,
2. tá arbeiðsgevari doyr, og búgvið verður skift í rættinum.
3. tá virki letur aftur, og arbeiðsgevarin prógvfast eftir rættarúrskurð ikki er førur fyri at rinda lønarkravið.

§ 2.

Treytin fyri at fáa pening úr grunninum er:
at kravið er uppiborið sambært lógini,
at kravið úrslitaleyst er roynt innkravt við rættsligari incasso,
at kravið er ikki avoldað,
at eingin onnur trygging er galdandi.

§ 3.

Arbeiðsgevarar rinda grunninum árliga 1 promillu av samlaðu lønútgjaldinini hvørt álmanakkaárið. Gjaldið skal í vera goldið í seinasta lagi 31. mars árið eftir og kann innheintast við panting

2. stk. Landskassin veitir grunninum somu upphædd.

lattingslov om lønmodtagernes sikringsfond.

§ 1.

Der etableres et fond til sikring af færøske lønmodtagere på det private arbejdsmarked krav på ikke udbetalt løn under disse forhold:

1. Når arbejdsstedet går konkurs,
2. når arbejdsgiveren dør, og boet skiftes af skifteretten,
3. når virksomheden lukker, og arbejdsgiveren beviser med retskendelse, at han ikke er i stand til at honorere lønkravet.

§ 2.

Det er en betingelse for at få beløb fra fondet:
at kravet er lovmedholdeligt,
at kravet uden resultat er forsøgt inddrevet med retslig incasso,
at kravet ikke er forældet,
at kravet ikke er sikret på anden måde.

§ 3.

Arbejdsgiverne betaler til fondet 1 promille af den samlede lønudbetaling hvert kalenderår. Beløbet skal være betalt ikke senere end 31. marts det følgende år og kan indhentes ved udpantning.

Stk. 2. Landskassen betaler samme beløb til fondet.

§ 4.

Vanlukkutryggingin umsitur grunnin og virkar móttakaranna vegna undir rættarviðgerð av trotabúgvi.

§ 5.

Grunnurin rindar í mesta lagi 90 % av kravinum.

2. stk. Grunnurin kann rinda løntakarunum forskot upp á krøv teirra í trotabúgvum v.m.

§ 6.

Roknskaparárið er fíggjarárið, og roknskapur grunsins verður grannskoðaður eftir somu reglum sum roknskapur landsins.

§ 7.

Almennir myndugleikar, arbeiðsgevarar og yrkisfeløg skulu eftir ynski geva grunninum upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðir um útgjalding úr grunninum.

§ 8.

Ósemjur millum arbeiðsgevara, búgv hausara og grunnin kunnu leggjast fyri gerðarrætt, um ósemja tekur seg upp millum partarnar.

§ 9.

Landsstýrið ger reglugerð fyri umsitingina av grunninum, uppkrevjingarháttí v.m.

§ 10.

Uppkrevjing til grunnin fer fyrstu ferð fram í byrjanini av 1987 við grundarlagi í lønargjaldingum arbeiðsgevaranna 1986.

§ 11.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 4.

Vanlukkutryggingin administrerer og fungerer på modtagernes vegne under skifterettens behandling af konkursloven.

§ 5.

Fondet betaler højst 90 % av kravet.

Stk. 2. Fondet kan betale lønmodtagerne forskud på krav i konkursboer m.v.

§ 6.

Regnskabsåret er finansåret, fondets regnskaber revideres efter de regler, som gælder for landets regnskaber.

§ 7.

Offentlige myndigheder, arbejdsgivere og erhvervsvirksomheder skal efter begæring give fondet de oplysninger, der har betydning for afgørelser om udbetaling fra fondet.

§ 8.

Tvistigheder mellem arbejdsgiver, dennes bo og fondet kan forelægges en voldgift, såfremt uoverensstemmelser opstår mellem parterne.

§ 9.

Landsstyret udfærdiger vedtægter angående fondets administration, opkrævningsform m.v.

§ 10

Opkrævning til fondet sker første gang i begyndelsen af 1987 på grundlag af arbejdsgivernes lønudbetalinger i 1986.

§ 11.

Denne lov træder i kraft straks.

14. apríl legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Uppískoytisálit

til álit II

uppskot

til

samtyktar

Uppskot til løgtingslóg um trygdargrunn løntakaranna verður sent landsstýrinum, og verður álagt landsstýrinum saman við partunum á arbeiðsmarknaðinum at arbeitt verður víðari við hesum máli og leggja tað aftur fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni 1987.

2. viðgerð 14. apríl. Uppskot til samtyktar frá ivan Johannesen fall við 10-0 atkvøðum. Uppskot frá D. P. Danielsen, § 1, fall við 4-0, lógaruppskotið sostatt burturdottið. Uppskot meirilutans § 1 samtykt við 17-0, §§ 2-11 samtyktar við 17-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

Broytingaruppskot til pkt. 6 í § 1 samtykt við 21-0 atkvøðum, § 1 soleiðis broytt samtykt við 21-0. § 2 samtykt við 21-0 atkvøðum og við 23-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1542-1-1. Lógirnar nr. 33 og 34 frá 30. apríl 1987.

46 Uppskot til løgtingslóg um menningarhjálp.

Ár 1986, lýsdagin 2. december legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um menningarhjálp.

§ 1.

Løgtingið setir árliga 0,1 % av bruttotjóðarinntøkuni í grunn til menningarhjálp.

2. stk. Navn grunsins verður »Grunnurin til menningarhjálp uttanlands.«

§ 2.

Løgtingið velur millum limir sínar eina 5 mannanevnd, ið avgerð á hvønn hátt, og hvat menningarhjálpin skal fara fram.

2. stk. Nevndin verður vald aftan á hvørt løgtingsval, og virkistíð hennara er valskeið løgtingsins.

§ 3.

5-mannanevndin og landsstýrið gera í felag reglugerð fyri virksemi grunsins. Landsstýrið kunnger reglugerðina.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1987.

lagtingslov om udviklingshjælp.

§ 1.

Lagtinget afsætter årlig 0,1 % af bruttonationalproduktet i fond til udviklingsbistand.

Stk. 2. Fondens navn er »Grunnurin til menningarhjálp uttanlands«.

§ 2.

Lagtinget vælger blandt sine medlemmer et udvalg på 5 medlemmer, der afgør på hvilken måde og til hvem udviklingsbistanden skal ydes.

Stk. 2. Udvalget vælges efter hvert lagtingsvalg og dets funktionsperiode er lagtingets valgperiode.

§ 3.

5-mandsudvalget og landsstyret udfærdiger sammen regulativ for fondens virksomhed. Landsstyret skal kundgøre regulativet.

§ 4.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1987.

Viðmerkingar:

Hin 14. september 1981 løgdu tingmenninir Karin Kjølbro, Atli Dam, Adolf V. Hansen og Jógvan Sundstein fram tingmál nr. 35/1981 uppskot til løgtingslóg

um menningarhjálp.

Uppskotið varð viðgjørt í marknaðarnevndini, men við 2. viðgerð hin 22. apríl fall tað, tí tað bert fekk 15 atkvøður fyri.

Tá ið hugtakið menningarhjálp verður umrøtt, verður ofta blandað saman vanlig neyðhjálp og verulig hjálp til sjálvhjálp, tað vil siga hjálp til at framleiða yniskar neyðugar vørur.

Ætlanin við hesum uppskoti er at útvega neyðugan almennan føroyskan pening til at stuðla føroyskum projektum í menningarlondum. Hesi projekt, sum helst skulu byggja á føroyska ekspertisu og know-how, eiga at útvega fólkinum í viðkomandi landi ella øki møguleika fyri menningarávísari framleiðslu innan t.d. fiskivinnu, iðnað ella líknandi og úthúgving. Fyritreytin, fyri at peningur kann játtast til eitt projekt, eigur at vera, at tað er væl gjøgnumarbeitt, at tað er væl tikið undir við tí viðkomandi landi, og at neyðug heildarfígging verður útvegað. Sjálvandi skulu eisini góð útlit vera fyri, at projektið kann eydnast.

Góð dømi um føroysk tiltøk á hesum øki eru framleiðslan av føroyskum bátum í India og African Seafood projektið í Senegal.

Hjálp í sambaud við neyðstøðu t.d. hungursneyð, jarðskjálvta, vatnflóð o.l. eigur framvegis at verða latin sum sjálvboðin innsavningarhjálp.

Eftir hesum uppskoti eigur grunnurin at verða stýrdur av eini 5 mannanevnd vald av tinginum. Hetta fyri at politiska umboðanin skal vera á so breiðum grundarlagi sum møguligt.

Um lógin verður samtykt, eigur nevndin at verða vald beinanvegin og reglugerðin skjótast gjørligt. Heitt verður eisini á tingið um at viðgera málið so skjótt, at um tað verður samtykt, kann upphæddd verða sett á fíggjarløgtingslógina fyri 1987.

Annars eigur bruttotjóðarúrtøkan, sum nýtast skal sum grundarlag fyri útrokningina av upphæddini at vera tann fyri árið frammanundan, tá fíggjarlógin verður samtykt. Td. verður grundarlagið fyri upphæddina á 1987 fíggjarlógini bruttotjóðarúrtøkan í 1985. Bruttotjóðarúrtøku upphæddin 1985 varð 5 - 5,5 mia. kr. Sostatt verður fyrsta upphæddin til grunnin stívar 5 mió. kr.

1. viðgerð 11. december. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 29. januar 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum 2. december 1986 og eftir 1. viðgerð tann 11. í sama mánað beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Áshjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) tekur ikki undir við uppskoti fólkatloksins og vísir til støðu samgongu

meirilutan í álitinum til fíggjarlógaruppskot landsstýrisins — løgtingslóg nr. 5/1985: Fíggjarløgtingslóg fyri árið 1987, har undir § 18-363840 Menningarhjálp eru avsettar kr. 5.000.000, har játtanir úr grunninum skulu leggjast fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til broytingaruppskotið fyri 1987 viðvíkjandi menningarhjálp og setir tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Peningurin úr grunninum verður at játta av landsstýrinum saman við fíggjarnevndini til menningarprojekt við føroyskari luttøku.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkaflokksins.

2. viðgerð 4. mars 1987. Uppskotið frá Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen fall við 3-0. § 1 fall við 4-0, og er málið burturdottið.

47. Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (academia færoensis).

Ár 1986, hósdagin 11. december legði Lassi Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis)	*lagtingslov om Fródskaparsetur Føroya (Academia Færoensis).*
I. Almennar fyriskipanir:	*I. Almindelige bestemmelser.*
§ 1. Fróðskaparsetur Føroya er sjálvognarstovnur, ið hevur til endamáls at inna gransking og geva frálæru á hægri stigi. *2. stk.* Fróðskaparsetrið fyrireikar til og heldur tey prógv og tær royndir, sum eftir fyriskipan landsstýrisins eru løgd undir setrið.	*§ 1.* Fróðskaparsetur Føroya (det færøske akademi) er en selvejende institution, der har til opgave at drive forskning og give højere undervisning. *Stk. 2.* Akademiet forbereder til og afholder de til det efter landsstyrets bestemmelse henlagte eksaminer og prøver.
§ 2. Øllum er heimilt at lýða á almennu fyrilestrar fróðskaparsetursins.	*§ 2.* Enhver er berettiget til at overvære akademiets offentlige forelæsninger.
§ 3. Fyrisitingarliga stendur fróðskaparsetrið beint undir landsstýrinum.	*§ 3.* Administrativt henhører akademiet direkte under landsstyret.
§ 4. Útreiðslurnar, ið standast av rakstri fróðskaparsetursins, verða bornar av landskassanum við játtan á løgtingsfíggjarlógini.	*§ 4.* De med akademiets drift forbundne udgifter afholdes med bevilling på lagtingets årlige finanslov.
§ 5. Leiðsluna av fróðskaparsetrinum hevur rektari saman við setursráð og megindeildarráðnum.	*§ 5.* Akademiet ledes af en rektor i forbindelse med akademiråd og fakultetsråd.

II. Rektari, vararektari og fyrisiting.

§ 6. Rektarin umboðar fróðskaparsetrið úteftir. Rektarin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni og stendur beinleiðis fyri teimum málum, sum ikki sambært lóg ella reglugerð liggja undir ráðunum.
2. stk. Rektarin sær til, at heimild er fyri samtyktum hjá ráðnum.

§ 7. Rektarin tekur avgerð í málum, ið ikki tola steðg og ikki kunnu bíða eftir viðgerð í ráðnum. Boð um tiknar avgerðir verða at geva svvarðandi ráð sum skjótast.

§ 8. Fyri rektaran er vararektari.

§ 9. Rektaranum til handar er fyrisiting við setursskrivara á odda.

§ 10. Rektarin og vararektarin verða valdir fyri 3 ár í senn millum fasta vísindastarvsliðið av limunum í megindeildarráðunum og teimum limunum í setursráðnum, ið ikki hava sess megindeildarráðunum. Rektarin og vararekturin kunnu ikki um somu tið vera megindeildarformenn.

III. Setursráð.

§ 11. Fróðskaparsetrið verður stýrt av setursráðnum.
2. stk. Fastir limir í setursráðnum eru rektarin, vararektarin og megindeildarformenninir. Rektarin er eisini formaður fyri setursráðnum, og vararektarin er næstformaður.

II. Rektor, prorektor og administration.

§ 6. Rektor repræsenterer akademiet udadtil. Rektor er ansvarlig for den daglige ledelse af akademiet og har den umiddelbare forvaltning af de anliggender, der ikke ved lov eller statut er henlagt til rådene.
Stk. 2. Rektor påser, at rådenes beslutninger er hjemlede.

§ 7. Rektor afgør sager, der ikke tåler opsættelse og ikke kan afvente behandling i rådene. Meddelse om de trufne beslutninger gives snarest til det pågældende råd.

§ 8. Prorektor er rektors stedfortræder.

§ 9. Til rådighed for rektor står en adminstration under ledelse af en akademisekretær.

§ 10. Rektor og prorektor vælges for 3 år ad gangen blandt akademiets faste videnskabelige personale af medlemmerne af fakultetsrådene og af de medlemmer af akademirådet, der ikke har sæde i fakultetsrådene. Rektor og prorektor kan ikke samtidig være dekaner.

III. Akademirådet.

§ 11. Akademirådet er akademiets øverste styrende organ.
Stk. 2. Faste medlemmer af akademirådet er rektor, prorektor og dekanerne. Rektor er tillige formand for akademirådet, og prorektor er næstformand.

3. stk. Til setursráðið verða harumframt vald eitt umboð fyri starvsfólk fyri 3 ár í senn og eitt umboð fyri næmingar fyri eitt ár í senn.
4. stk. Setursráðið viðger mál viðvíkjandi fróðskaparsetrinum sum heild og viðurskiftum millum tvær ella fleiri megindeildir.

§ 12. Setursráðið ger uppskot um stýrisskipanarreglur fróðskaparsetursins.
2. stk. Setursráðið stendur fyri langtíðar ráðlegging um hølis- og fíggjarviðuskifti.
3. stk. Setursráðið ger uppskot til fíggjarætlan og býtir játtanirnar við fyriliti fyri heildarstarvsemi setursins.
4. stk. Setursráðið tekur avgerð í málum um burturvísing av næmingum.
5. stk. Setursráðið ásetur reglur um at seta lærarar í starv.
6. stk. Setursráðið tekur eftir tilmæli frá megineildarráðunum avgerð um starvsseting, starvsloysn ella farloyvi hjá lærarum.
7. stk. Setursráðið tekur eftir tilmæli frá megindeildarráðunum avgerð í spurningum um góðskriving við fróðskaparsetrið av útbúgvingum ella pørtum av útbúgvingum, sum næmingar hava tikið á øðrum lærustovnum.

IV. Megindeildarráð.

§ 13. Gransking og útbúging á fróðskaparsetrinum fara fram í megindeildum.
2. stk. Hvør megindeild verður stýrd av einum megindeildarráði.

Stk. 3. Til akademirådet vælges desuden for 3 år ad gangen en repræsentant for det teknisk/administrative personale og for et år ad gangen en repræsentant for de studerende.
Stk. 4. Akademirådet behandler sager vedrørende akademiet som helhed og forholdet mellem to eller flere fakulteter.

§ 12. Akademirådet udarbejder forslag til regler om styrelse af akademiet.
Stk. 2. Akademirådet står for akademiet langsigtede fysiske og økonomiske planlægning.
Stk. 3. Akademirådet udarbejder akademiets budgetforslag og fordeler dets bevillinger under hensyntagen til akademiets samlede virksomhed.
Stk. 4. Akademirådet afgør sager om relegation af studerende.
Stk. 5. Akademirådet fastsætter regler for ansættelse af lærere.
Stk. 6. Akademirådet træffer efter indstilling fra fakultetsrådene afgørelse om ansættelse, afsked eller orlov, forsåvidt angår lærere.
Stk. 7. Akademirådet afgør efter indstilling fra fakultetsrådene spørgsmål om meritoverførsel af uddannelser eller dele deraf, som studerende har gennemført ved andre uddannelsesinstitutioner.

IV. Fakultetsråd.

§ 13. Forskning og uddannelse ved akademiet foregår inden for fakulteter.
Stk. 2. Hvert fakultet ledes af et fakultetsråd.

3. stk. Hvørt megindeildarráð hevur 5 limir, ið verða valdir av og millum fólk, ið eru knýtt at avvarðandi megindeild. Fasta vísindastarvsliðið velur tvey umboð sínámillum, uttanseturs lærarar eitt umboð sínámillum, starvsfólkið eitt umboð sínámillum, øll fyri 3 ár í senn, og næmingarnir eitt umboð sínámillum fyri eitt ár í senn.

4. stk. Hvørt megindeildarráð velur megindeildarformann fyri eitt ár í senn. Megindeildarformaðurin verður valdur millum fasta vísindastarvsliðið á megindeildarráðnum.

Stk. 3. Hvert fakultetsråd består af 5 medlemmer, der vælges af og blandt personer med tilknytning til det pågældende fakultet. For 3 år ad gangen vælges to repræsentanter af og blandt det faste videnskabelige personale, en repræsentant af og blandt de eksterne lærere, en repræsentant af og blandt det teknisk/administrative personale samt for et år ad gangen en repræsentant af og blandt de studerende.

Stk. 4. Fakultetsrådet vælger for 3 år ad gangen en dekan. Dekanen vælges blandt det faste videnskabelige personale i fakultetsrådet.

§ 14. Megindeildarráðini taka hvørt í sínum lagi avgerð um býtið av teimum verkevnum, ið liggja til megindeildina.

2. stk. Megindeildarráðini áseta, við heimild í galdandi fyriskipanum, reglur fyri prógtøku, prógtøl og frálæru, eins og tey tilevna námsskipanir.

3. stk. Megindeildarráðini taka avgerð í málum um undantaksloyvi frá prógskipan og námsskipan.

4. stk. Megindeildarráðini siggja til, at námini kunnu verða avrikað eins og fyriskipað í galdandi reglum og eftir ásettari tíð, og at tann frálæra, ið givin verður, er í samsvari við endamál námsins og ásettar prógskipanir.

5. stk. Megindeildarráðini stíla fyri frálæru og prógtøkum.

6. stk. Megindeildarráðini geva setursráðnum tilmæli um starvsseting, starvsloysn og farloyvi hjá lærarum.

§ 14. Fakultetsrådene træffer hver for sig afgørelse om fordelingen af de opgaver, der påhviler fakultetet.

Stk. 2. Fakultetsrådene fastsætter inden for gældende bestemmelser regler for eksamen, karaktergivning og undervisning samt udarbejder studieordninger.

Stk. 3. Fakultetsrådene afgør sager om dispensation fra eksamensordning og studieordning.

Stk. 4. Fakultetsrådene påser, at studierne kan gennemføres som forudsat i gældende regler herom og på den normerede tid, og at den undervisning, der gives, er i overensstemmelse med uddannelsens mål og de fastsatte eksamensordninger.

Stk. 5. Fakultetsrådende tilrettelægger undervisningen og afholdelsen af eksaminer.

Stk. 6. Fakultetsrådene afgiver indstilling til akademirådet om ansættelse, afsked og orlov, forsåvidt angår lærere.

7. stk. Megindeildarráðini geva setursráðnum tilmæli í spurningum um góðskriving við fróðskaparsetrið av útbúgvingum, sum næmingar hava tikið á øðrum lærustovnum.

V. Samstarvsnevnd.

§ 15. Samstarvsnevndin skal vera liður millum landsstýrið og fróðskaparsetrið.
2. stk. Í samstarvsnevndini sita 4 limir.
3. stk. Rektari fróðskaparsetursins, setursskrivarin og tann landsstýrismaður, ið setrið hoyrir undir, eru fastir nevndarlimir.
4. stk. Landsstýrið tilnevnir harumframt ein lim at umboða landsfyrisitingina.
5. stk. Nevndin heldur fund í minsta lagi 2 ferðir um árið.
6. stk. Heildarfíggjarætlanin fyri fróðskaparsetrið verður løgd fyri nevndina til kunningar, áðrenn hon verður send landsstýrinum.
7. stk. Í minsta lagi eina ferð um árið verður í nevndini greitt frá starvssemi fróðskaparsetursins, m.a. nýggjum útbúgvingarætlanum.

VI. Samskiftisnevnd.

§ 16. Sett kann verða samskiftisnevnd millum stovnar, felagsskapir, almenn yvirvøld og fróðskaparsetrið til kunngerðar um viðurskifti av sínámillum áhuga.

Stk. 7. Fakultetsrådene afgiver indstilling til akademirådet i spørgsmål om meritoverførsel af uddannelser eller dele deraf, som studerende har gennemført ved andre uddannelsesinstitutioner.

V. Samarbejdsnævn.

§ 15. Samarbejdsnævnet skal fungere som kontaktorgan mellem landsstyret og akademiet.
Stk. 2. Samarbejdsnævnet består af 4 medlemmer.
Stk. 3. Rektor for akademiet, akademisekretæren samt den landsstyremand, hvorunder akademiet hører, er faste medlemmer af nævnet.
Stk. 4. Desuden udpeger landsstyret en repræsentant for sin adminstration.
Stk. 5. Nævnet holder møde mindst to gange om året.
Stk. 6. Det samlede budgetforslag for akademiet forlægges i nævnet til orientering inden fremsendelse til landsstyret.
Stk. 7. Mindst en gang om året gives der en redegørelse i nævnet for akademiets virksomhed, herunder nye uddannelsesplaner.

VI. Kontaktudvalg.

§ 16. Der kan nedsættes kontaktudvalg mellem institutioner, organisationer, offentlige myndigheder og akademiet til orientering om forhold af gensidig interesse.

VII. Aðrar fyriskipanir:

§ 17. Gjørd verður reglugerð, ið dýpir lógina og ásetur ískoytisreglur, m.a. reglur um skipan av deildum.

VIII. Bráðfeingis- og gildisfyriskipanir:

§ 18. Eftir tilmæli frá setursráðnum kann landsstýrið veita undantaksloyvi frá fyriskipanum lógarinnar, so langt um neyðsýnt er, meðan fróðskaparsetrið er í uppbygging.

§ 19. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, sum hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi lóg nr. 28 frá 20. mai 1965 um at seta á stovn Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis).
2. stk. Reglur, ið eru givnar við heimild í § 1 í lógini frá 1965, verða verandi í gildi, tíl tær eru avloystar av reglum, ið eru givnar við heimild í hesi lóg.

VII. Andre bestemmelser:

§ 17. Der udarbejdes en status, hvori optages regler, der uddyber og supplerer loven, herunder regler om oprettelse af institutter.

VIII. Overgangs- og ikrafttrædelsesbestemmelse.

§ 18. Efter indstilling fra akademirådet kan landsstyret give dispensation fra lovens bestemmelser i det omfang, dette er nødvendigt under udbygningen af akademiet.

§ 19. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kunngjort og, samtidig ophæves lagtingslov nr. 28. af 20. maj 1965 om oprettelse af et færøsk akademi (Academia Færoensis).
Stk. 2. Regler, der er fastsat med hjemmel i § 1 i loven af 1965, forbliver i kraft, indtil de afløses af regler fastsat med hjemmel i denne lov.

Viðmerkingar:

Fróðskaparsetur Føroya er sett á stovn við løgtingslóg nr. 28 frá 20. mai 1965.

Í samgonguskjalinum hjá sitandi landsstýri stendur undir skúla- og mentamálum:

»Miðað verður ímóti at útbyggja møguleikan fyri prógvløkuleestri við Fróðskaparsetur Føroya og menna henda stovn sum hægri lærustovn (lærdan háskúla).«

Til at gera uppskot í hesum máli setti landsstýrið á vári 1985 eina nevnd við 8 føroyskum og 3 útlendskum limum.

Nevndin var liðug við arbeiði sítt í mars 1986 og lat landsstýrinum »Álit um Fróðskaparsetur Føroya«.

Í álitinum verður m.a. skotið upp, at stýrisskipan setursins verður broytt, soleiðis at hon fylgir somu meginreglum, sum galda fyri lærdar háskúlar í grannalondum okkara, t.e. at fróðskaparsetrið skal verða stýrt av teimum, sum starvast og virka har.

Hesum tekur landsstýrið undir við og setir tí fram uppskot til nýggja lóg um Fróðskaparsetur Føroya.

Sbrt. lógini frá 1965 verður setursráðið stýrt av einum setursráði við 5 limum. Tveir teirra eru føddir limir, 3 valdir av Føroya Fróðskaparfelag, og limirnir velja sínámillum ein formann fyri eitt ár í senn.

Í uppskotinum til nýggja lóg varðveitir setursráðið myndugleika sín sum hægsta ráð setursins. Munurin er, at limirnir eru fleiri, og at teir eru valdir millum fólk og av fólki, ið hava starv á setrinum. Eisini næmingar fáa umboðan í ráðnum.

Haraftrat fær setrið nú rektara og vararektara, ið verða valdir fyri 3 ár í senn.

Lógaruppskotið ásetir, at tað er rektarin, ið saman við setursráðnum og megindeildarráðunum hevur leiðsluna av setrinum.

Rektarin umboðar setrið úteftir eins og ráðsformaðurin í verandi skipan. Nú kemur ábyrgd av dagligu leiðsluni aftrat.

Í álitinum verður skotið upp at skipa Fróðskaparsetrið í megindeildir (fyri ávikavist hugvísindi, samfelagsvísindi, náttúruvísindi/tøkni).

Eftir lógaruppskotinum skal hvør megindeild verða stýrd av einum megindeildarráði, sum fyri eitt ár í senn velur eitt av limum sínum í føstum vísindastarvi til formann.

Ábyrgdarøkið hjá setursráðnum er fyrst og fremst stýrisskipanarreglur, langtíðarætlanir og fíggjarmál.

Megindeildarráðini hava fakligu ábyrgdina av innihaldinum í námunum og av frálæruni.

Eftir tørvi kunnu megindeildirnar við reglugerð verða skipaðar í deildir.

Skilagóð menning av gransking og hægri útbúgving er treytað av góðum sambandi og orðaskifti millum stovnin, har hetta fer fram, og landsmyndugleikarnar. Hesum skal samstarvsnevndin skipa fyri. Í lógaruppskotið er eisini tikin við eini samskiftisnevnd, ið er ætlað at vera sambindingarliður millum stovnar, felagsskapir, almenn yvirvøld og fróðskaparsetrið, soleiðis at partarnir lættliga skulu fáa høvi til at kunna seg um viðurskifti av felags áhuga.

Landsstýrið skjýtur upp, at lógin fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd og avloysir lógina frá 1965 um stovnseting av Fróðskaparsetur Føroya.

1. viðgerð 3. mars 1987. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 11. december 1986 og varð eftir 1. viðgerð tann 3. mars 1987 beint til viðgerðar í mentannar- og skúlanevndini.

Fróðskaparsetur Føroya varð sett á stovn við løgtingslóg dagfest 20. mai 1965 eftir uppskoti frá Føroya Fróðskaparfelag. Frá byrjan varð áherðsla løgd á føroyskt mál og mentan. Í 1971 varð lærari settur at undirvísa í heimspeki, fyri at tað skuldi bera til at taka filosofikum í Føroyum. Í 1972 byrjaði náttúruvísinda-

liga støðisútbúgvingin og í 1974 ársnám í norðurlendskum, serstakliga føroyskum máli og bókmentum, sum seinni varð víðkað til exam.art. prógv (2 ár). Høvuðsnám — cand.phil. — 2 ár omaná exam.art. byrjar til heystar. Undirvísingin til 1. part í gudfrøði hevur verið síðan 1976. Í 1986 varð starv sett í søgu og Søguvísindadeildin skipað. Væntandi byrjar exam.art. nám í søgu til heystar. Harafturat hevur setrið øll árini skipað fyri eftirútbúgving av lærarum, kvøldskeiðum og almennum fyrilestrum.

Umframt undirvísing hoyrir gransking eisini uppí arbeiði hjá lærarunum á setrinum.

Fróðskaparsetrið er ein sjálveigandi stovnur við játtan á fíggjarlógini. Setrið verður stýrt av setursráðnum. Fastir limir í setursráðnum eru í løtuni landsbókavørðurin og rektarin á studentaskúlanum í Hoydølum. Hinir triggir limirnir eru valdir av Føroya Fróðskaparfelag. Setrið er í løtuni skipað í tríggjar deildir: Føroyamálsdeildina, Søguvísindadeildina við gudfrøði og Støðisútbúgvingardeildina. Setursráðið hevur so við og við latið dagligu ábyrgdina av undirvísing og fakligum spurningum uppí hendurnar á deildunum.

Fyri hvørja deild er eitt deildarráð við deildarráðsformanni á odda. Harumframt er eisini lestrarráð á deildunum og eitt lærararáð.

Á setrinum hevur higartil ikki borið til at lokið endaligt prógv, men bert partar av prógvum. Hin vegin kann sigast, at størsti parturin av teimum, sum hava byrjað útbúgving sína á setrinum hava klárað seg sera væl, har tey hava hildið fram. Undir hesum karmum hevur setrið virkað til henda dag, men tað hevur í mong ár verið talað um at broyta stýrisskipanina á setrinum, tí misnøgd hevur verið um, at setrið verður stýrt av uttansetursfólki.

Tann 28. mars 1985 setti landsstýrið nevnd at dagføra skipan setursins.

Nevndin legði fram eitt álit í mars 1986. Í hesum áliti verður skotið upp, at skipað verður fyri styttri útbúgvingum 3-4 ár, ið skulu geva arbeiðsførleika, samstundis sum tær eisini eru grundarlag undir framhaldandi lesnaði uttanfyri Føroyar. Hugsað verður fyrst og fremst um útbúgvingar, sum við fyrimuni kunnu takast í Føroyum t.e. útbúgingar í føroyskum máli, søgu, ávisum samfelagsvísindum, ávísum náttúruvísindum og ávísari verkfrøði. Hesum er gjølla greitt frá í bláa álitinum um Fróðskaparsetur Føroya og framtíðarbygnaðin hjá hesum setri frá mars 1986.

Undirvísingin skal fara fram á trimum megindeildum, sum koma at hava fakligu ábyrgdina. Fyri hvørja megindeild er eitt megindeildarráð valt av lærarum, starvsfólkum og næmingum á deildini við megindeildarráðsformanninum á odda.

Setursráðið, beinleiðis undir landsstýrinum, skal vera ovasti myndugleiki setursins. Í setursráðnum situr rektar, vararektari, megindeildarráðsformenn og umboð fyri starvsfólk og næmingar. Rektari verður valdur fyri seg og kemur hann at hava dagligu leiðsluna av setrinum og umboða setrið úteftir. Rektarin skal vera ein av føstu lærarum setursins.

lógarbroytingin førir í stuttum við sær, at Føroya Fróðskaparfelag ikki longur kemur at hava ávirkan á setrið, heldur ikki rektarin á Studentaskúlanum í Hoydølum ella landsbókavørðurin. Tey, sum dagliga starvast á setrinum, fyrst og fremst lærararnir, koma nú at stýra. Hetta er í samsvari við vanligu stýrisskipanina á hægri lærustovnum í grannalondum okkara. Kortini er hetta uppskoti í munandi einfaldari. Setrið er nú so stórt, at tað er neyðugt við eini leiðslu á staðnum, um alt skal virka eftir ætlan.

Umframt føstu lærararnar er ætlanin er knýta fólk við granskingarligum førleika við starvi aðrastaðni t.d. á almennum stovnum, privatum virkjum og øðrum at setrinum, soleiðis at setrið í undirvísingini fær nyttu av hesum fólkum. Á henda hátt verður eisini ein støðug sínámillum ávirkan millum setur og samfelag.

Undir nevndarviðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri setursráðið og fyri næmingarnar á Fróðskaparsetrinum. Umboðini fyri Setursráðið eins væl og umboðini fyri næmingarnar bóru fram ynski um, at næmingaumboðini í Setursráð og Megindeildarráð verða økt úr einum upp í tvey umboð.

Tað er upplýst fyri nevndini, at landsstýrið tekur undir við hesum broytingaruppskotum.

Nevndin er sinnað at ganga hesum ynski á møti, og hevur broytt lógaruppskotið samsvarandi.

Frá Fróðskaparsetri Føroya eru eisini komin uppskot um nakrar málsligar broytingar í lógaruppskotinum — broytingar ein samd nevnd tekur undir við.

Av praktiskum grundum eru allar hesar broytingar skrivaðar inn í fyriliggjandi lógaruppskot.

Sjálvar broytingarnar eru lagdar við sum skjal.

Ein samd nevnd setir tí hetta broytta lógaruppskot fram í heilum líki í staðin fyri uppskot landsstýrisins.

Uppskot

til

løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis)	*lagtingslog om Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis)*
I. Almennar ásetingar.	*I. Almindelige bestemmelser.*
§ 1. Fróðskaparsetur Føroya er sjálvsognarstovnur, ið hevur til endamáls at inna gransking og geva fráleru á hægri stigi.	*§ 1.* Fróðskaparsetur Føroya (det færøske akademi) er en selvejende institution, der har til opgave at drive forskning og give højere undervisning.

2. stk. Fróðskaparsetrið fyrireikar til og heldur tey prógv og tær royndir, sum eftir fyriskipan landsstýrisins eru løgd undir setrið.

§ 2. Øllum er heimilt at lýða á almennu fyrilestrar fróðskaparsetursins.

§ 3. Fyrisitingarliga stendur fróðskaparsetrið beint undir landsstýrinum.

§ 4. Útreiðslurnar, ið standast av rakstri fróðskaparsetursins, verða bornar av landskassanum við játtan á løgtingsfíggjarlógini.

§ 5. Leiðsluna av fróðskaparsetrinum hevur rektari saman við setursráð og megindeildarráðum.

II. Rektari, vararektari og fyrisiting

§ 6. Rektarin umboðar fróðskaparsetrið úteftir. Rektarin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni og stendur beinleiðis fyri teimum málum, sum ikki sambært lóg ella reglugerð liggja undir ráðnum.
2. stk. Rektarin sær til, at heimild er fyri samtyktum hjá ráðunum.

§ 7. Rektarin tekur avgerð í málum, ið ikki tola steðg og ikki kunnu bíða eftir viðgerð í ráðunum. Boð um tiknar avgerðir verða at geva avvarðandi ráð sum skjótast.

Stk. 2. Akademiet forbereder til og afholder de til det efter landsstyrets bestemmelse henlagte eksaminer og prøver.

§ 2. Enhver er berettiget til at overvære akademiets offentlige forelæsninger.

§ 3. Administrativt henhører akademiet direkte under landsstyret.

§ 4. De med akademiets drift forbundne udgifter afholdes ved bevilling på lagtingets årlige finanslov.

§ 5. Akademiet ledes af en rektor i forbindelse med akademiråd og fakultetsråd.

II. Rektor; prorektor og administration.

§ 6. Rektor repræsenterer akademiet udadtil. Rektor er ansvarlig for den daglige ledelse af akademiet og har den umiddelbare forvaltning af de anliggender, der ikke ved lov eller status er henlagt til rådene.
Stk. 2. Rektor påser, at rådenes beslutninger er lovlige.

§ 7. Rektor afgør sager, der ikke tåler opsættelse og ikke kan afvente behandling i rådene. Meddelelse om de trufne beslutninger gives snarest til det pågældende råd.

§ 8. Fyri rektaran er vararektari.

§ 9. Rektaranum til handar er fyrisiting við setursskrivara á odda.

§ 10. Rektarin og vararektarin verða valdir fyri 3 ár í senn millum fasta vísindastarvslið fróðskaparsetursins av limunum í megindeildarráðunum og teimum limunum í setursráðnum, ið ikki hava sess í megindeildarráðum. Rektarin og vararektarin kunnu ikki um somu tíð vera megindeildarformenn.

III. Setursráð.

§ 11. Fróðskaparsetrið verður stýrt av setursráðnum.
2. stk. Fastir limir í setursráðnum eru rektarin, vararektarin og megindeildarmenninir. Rektarin er eisini formaður fyri setursráðnum, og vararektarin er næstformaður.

3. stk. Til setursráðið verða harumframt vald eitt umboð fyri starvsfólk fyri 3 ár í senn. Næmingaumboðini í øllum megindeildarráðunum velja sínámillum tvey umboð í setursráðið fyri eitt ár í senn.
4. stk. Setursráðið viðger mál viðvíkjandi fróðskaparsetrinum sum heild og viðurskiftum millum tvær ella fleiri megindeildir.

§ 8. Prorektor er rektors stedfortræder.

§ 9. Til rådighed for rektor står en administration under ledelse af en akademisekretær.

§ 10. Rektor og prorektor vælges for 3 år ad gangen blandt akademiets faste videnskabelige personale af medlemmerne af fakultetsrådene og af de medlemmer af akademirådet, der ikke har sæde i fakultetsrådene. Rektor og prorektor kan ikke samtidig vara dekaner.

III. Akademirådet.

§ 11. Akademirådet er akademiets øverste styrende organ.
Stk. 2. Faste medlemmer af akademirådet er rektor, prorektor og dekanerne. Rektor er tillige formand for akademirådet, prorektor er næstformand.

Stk. 3. Til akademirådet vælges desuden for 3 år ad gangen en repræsentant for det teknisk/administrative personale og for et år ad gangen en repræsentant for de studerende.
Stk. 4. Akademirådet behandler sager vedrørende akademiet som helhed og forholdet mellem to eller flere fakulteter.

§ 12. Setursráðið ger uppskot um stýrisskipanarreglur fróðskaparsetursins.
2. stk. Setursráðið stendur fyri langtíðar ráðlegging um høllis- og búskaparviðurskifti.
3. stk. Setursráðið ger uppskot til fíggjarætlan og býtir játtanirnar við fyriliti fyri heildarstarvssemi setursins.
4. stk. Setursráðið tekur avgerð í málum um burturvísing av næmingum.
5. stk. Setursráðið setur reglur um at seta lærarar í starv.
6. stk. Setursráðið tekur eftir tilmæli frá megindeildarráðunum avgerð um starvsseting, starvsloysn ella farloyvi hjá lærarum.
7. stk. Setursráðið tekur eftir tilmæli frá megindeildarráðunum avgerð í spurningum um góðskriving við fróðskaparsetrið av útbúgvingum ella pørtum av útbúgvingum, sum næmingar hava tikið á øðrum lærustovnum.

§ 12. Akademirådet udarbejder forslag til regler om styrelse af akademiet.
Stk. 2. Akademirådet står for akademiet langsigtede fysiske og økonomiske planlægning.
Stk. 3. Akademirådet udarbejder akademiets budgetforslag og fordeler dets bevillinger under hensyntagen til akademiets samlede virksomhed.
Stk. 4. Akademirådet afgør sager om relegation af studerende.
Stk. 5. Akademirådet fastsætter regler for ansættelse af lærere.
Stk. 6. Akademirådet træffer efter indstilling fra fakultetsrådene afgørelse om ansættelse, afsked eller orlov, forsåvidt angår lærere.
Stk. 7. Akademirådet afgør efter indstilling fra fakultetsrådene spørgsmål om meritoverførsel af uddannelser eller dele deraf, som studerende har gennemført ved andre uddannelsesinstitutioner.

IV. Megindeildarráð.

§ 13. Gransking og útbúgving á fróðskaparsetrinum fara fram í megindeildum.
2. stk. Hvør megindeild verður stýrd av einum megindeildarráði.
3. stk. Hvør megindeildarráð hevur 6 limir, ið verða valdir av og millum fólk, ið eru knýtt at avvarðandi megindeild. Fasta vísindastarvsliðið velur tvey umboð sínámillum, uttanseturs lærarar eitt umboð sínámillum, starvsfólkið eitt umboð sínaámillum, øll fyri 3 ár í senn, og næmingarnir tvey umboð sínámillum fyri eitt ár í senn.

IV. Fakultetsråd.

§ 13. Forskning og uddannelse ved akademiet foregår inden for fakulteter.
Stk. 2. Hvert fakultet ledes af et fakultetsråd.
Stk. 3. Hvert fakultetsråd består af 5 medlemmer, der vælges af og blandt personer med tilknytning til det pågældende fakultet. For 3 år ad gangen vælges to repræsentanter af og blandt det faste videnskabelige personale, en repræsentant af og blandt de eksterne lærere, en repræsentant af og blandt det teknisk/administrative personale samt for et år ad gangen en repræsentan af og blandt de studerende.

4. stk. Hvørt megindeildarráð velur megindeildarformann fyri 3 ár í senn. Megindeildarformaðurin verður valdur millum fasta vísindastarvsliðið í megindeildarráðnum.

§ 14. Megindeildarráðini taka hvørt í sínum lagi avgerð um hýtið av teimum verkevnum, ið liggja til megindeildina.

2. stk. Megindeildarráðini seta, við heimild í galdandi fyriskipanum, reglum fyri prógtøku, prógtalagávu og frálæru, eins og tey evna til námsskipanir.

3. stk. Megindeildarráðini taka avgerð í málum um undantaksloyvi frá prógskipan og námsskipan.

4. stk. Megindeildarráðini siggja til, at námini kunnu verða avrikað eins og fyrisett í galdandi reglum og eftir ásettari tíð, og at tann frálæra, ið givin verður, er í samsvari við endamál námsins og ásettar prógskipanir.

5. stk. Megindeildarráðini stíla fyri frálæru og prógtøkum.

6. stk. Megindeildarráðini geva setursráðnum tilmæli um starvsseting, starvsloysn og farloyvi hjá lærarum.

7. stk. Megindeildarráðini geva setursráðnum tilmæli í spurningum um góðskriving við fróðskaparsetrið av útbúgvingum ella pørtum av útbúgvingum, sum næmingar hava tikið á øðrum lærustovnum.

Stk. 4. Fakultetsrådet vælger for 3 år ad gangen en dekan. Dekanen vælges blandt det faste videnskabelige personale i fakultetsrådet.

§ 14. Fakultetsrådene træffer hver for sig afgørelse om fordelingen af de opgaver, der påhviler fakultet.

Stk. 2. Fakultetsrådene fastsætter inden for gældende bestemmelser regler for eksamen, karaktergivning og undervisning samt udarbejder studieordninger.

Stk. 3. Fakultetsrådene afgør sager om dispensation fra eksamensordning og studieordning.

Stk. 4. Fakultetsrådene påser, at studierne kan gennemføres som forudsat i gældende regler herom og på den normerede tid, og at den undervisning, der gives, er i overensstemmelse med uddannelsens mål og de fastsatte eksamensordninger.

Stk. 5. Fakultetsrådene tilrettlægger undervisningen og afholdelsen af eksaminer.

Stk. 6. Fakultetsrådene afgiver indstilling til akademirådet om ansættelse, afsked og orlov, forsåvidt angår lærere.

Stk. 7. Fakultetsrådene afgiver indstilling til akademirådet i spørgsmål og meritoverførsel af uddannelser eller dele deraf, som studerende har gennemført ved andre uddannelsesinstitutioner.

V. Samstarvsnevnd.

§ 15. Samstarvsnevndin skal vera liður millum landsstýrið og fróðskaparsetrið

V. Samarbejdsnævn.

§ 15. Samarbejdsnævnet skal fungere som kontaktorgan mellem landsstyret og akademiet.

2. stk. Í samstarvsnevndini sita 4 limir.

3. stk. Rektari fróðskaparsetursins, setursskrivarin og tann landsstýrismaður, ið setrið hoyrir undir, eru fastir nevndarlimir.

4. stk. Landsstýrið tilnevnir harumframt ein lim at umboða landsfyrisitingina.

5. stk. Nevndin heldur fund í minsta lagi 2 ferðir um árið.

6. stk. Heildarfíggjarætlanaruppskotið fyri fróðskaparsetrið verður løgd fyri nevndina til kunningar, áðrenn hon verður send landsstýrinum.

7. stk. Í minsta lagi eina ferð um árið verður í nevndini greitt frá starvssemi fróðskaparsetursins, m.a. nýggjum útbúgvingarætlanum.

Stk. 2. Samarbejdsnævnet består af 4 medlemmer.

Stk. 3. Rektor for akademiet, akademisekretæren samt den landsstyremand, hvorunder akademiet hører, er faste medlemmer af nævnet.

Stk. 4. Desuden udpeger landsstyret er repræsentant for sin administration.

Stk. 5. Nævnet holder møde mindst to gange om året.

Stk. 6. Det samlede budgetforslag for akademiet forelægges i nævnet til orientering inden fremsendelse til landsstyret.

Stk. 7. Mindst en gang om året gives der en redegørelse i nævnet for akademiets virksomhed, herunder nye uddannelsesplaner.

VI. Samskiftisnevnd.

§ 16. Sett kann verða samskiftisnevnd millum stovnar, felagsskapir, almenn yvirvøld og fróðskaparsetrið til kunningar um viðurskifti av sínámillum áhuga.

VI. Kontaktudvalg.

§ 16. Der kan nedsættes kontaktudvalg mellem institutioner, organisationer, offentlige myndigheder og akademiet til orientering om forhold af gensidig interesse.

VII. Aðrar ásetingar.

§ 17. Gjørd verður reglugerð, ið dýpir lógina og ásetur ískoytisreglur, m.a. reglur um skipan av deildum.

VII. Andre bestemmelser.

§ 17. Der udarbejdes en statut, hvori optages regler, der uddyber og supplerer loven, herunder regler om oprettelse af institutter.

VIII. Bráðfeingis og gildisfyriskipanir.

§ 18. Eftir tilmæli frá setursráðnum kann landsstýrið veita undantaksloyvi frá fyriskipanum lógarinnar, so langt sum neyðsýnt er, meðan fróðskaparsetrið er í uppbygging.

VIII. Overgangs- og ikrafttrædelsesbestemmelse.

§ 18. Efter indstilling fra akademirådet kan landsstyret give dispensation fra lovens bestemmelser i det omfang, dette er nødvendigt under udbygningen af akademiet.

§ 19. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, sum hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi lóg nr. 28 frá 20. mai 1965 um at seta á stovn Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis).

2. stk. Reglur, ið eru givnar við heimild í § 1 í lógini frá 1965, verða verandi í gildi, til tær eru avloystar av reglum, ið eru givnar við heimild í hesi lóg.

§ 19. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort og samtidig ophæves lagtingslov nr. 28 af 20. maj 1965 om oprettelse af et færøsk akademi (Academia Færoensis).

Stk. 2. Regler, der er fastsat med hjemmel i § 1 i loven af 1965, forbliver i kraft, indtil de afløses af regler fastsat med hjemmel i denne lov.

SKJAL 1.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Academia Færoensis

Uppskot til broyting í

Løgtingsmáli nr. 47/1986: Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya:

Grein 11, 3. petti verður orðað soleiðis:

»Til setursráðið verður harumframt valt eitt umboð fyri starvsfólk fyri 3 ár í senn. Næmingaumboðini í øllum megindeildarráðunum velja sínámillum tvey umboð í setursráðið fyri eitt ár í senn.«

Grein 13, 3. petti verður orðað soleiðis:

»Hvørt megindeildarráð hevur 6 limir, ið verða valdir av og millum fólk, ið eru knýtt at avvarðandi megindeild. Fasta vísindastarvsljóðið velur tvey umboð sínámillum, uttanseturs lærarar eitt umboð sínámillum, starvsfólkið eitt umboð sínámillum fyri eitt ár í senn.«

Soleiðis samtykt á setursráðsfundi hin 6. mars 1987.

FRÓÐSKPARSETUR FØROYA, 9.3.1987.

SKJAL 2

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya

1. (Almennar) fyriskipanir til ásetingar fyriskipan svarar til d. anordning, forordning)

§ 1, 2 Sjálvognarstovnur til sjálvsognarstovnur
§ 4, 3 av landskassnum til »vantar í danska tekstinum
§ 8 »Fyri rektaran er vararektari« (ov veikt orðað í samanburði við danska tekstin)
§ 10,4 vísindastarvsliðið til vísindastarvslið fróðskaparsetursins
§ 10,8 megindeildarráðunum til megindeildarráðum
§ 11 ov veikt orðað í saman. við d. tekstin
§ 11, 2. stk. rok-tarin —skeivt sundurbýtt
§ 11, 3. stk., 3 starvsfólk — ikki nóg gott samsvar við d. tekstin
§ 12, 2. stk.,3 hølis-samsvarar ikki við d. tekstin
fíggjar- samsvarar ikki við d. tekstin, átti at verið fíggjarsamsvara búskapar-
§ 12, 3. stk., 3 »býtur« til býtir
§ 12, 5. stk. ásetur til setur
§ 7. stk. bronglut orðað, mæli til, at orðingin í álitinum verður nýtt í høvuðsheitum við uppískoytinum: á fróðskaparsetrinum.
§ 13,3.stk. »av og millum fólk« — einki samsvar í d. tekstinum. Orðingin í álitinum er eins fræg.
§ 13, 4. stk., 3 eitt til 3
§ 14, 2. stk., 2 áseta til seta
§ 14, 2. stk., 5 prógtøl — ikki samsvar við d. karaktergivning (sí álit)
§ 14, 2. stk., 6 tilnevna til evna til
§ 14, 3. stk., 3 prógskipan og námsskipan ráðið øvugt í upprunauppskotinum
§ 14, 7. stk., 4 »við fróðskaparsetrið« ikki í d. tekstinum (sí álitið)
§ 15, 2. stk. liður — ikki samsvar við **kontaktorgan** í d. tekstinum.
§ 15, 6. stk. Heildarfíggjarætlanin til Heildarfíggjarætlanaruppskotið.

VVI.
fyriskipanir til ásetingar
§ 17 er »deild« sama sum »institut«?
§ 18,5 »neyðsýnt« til neyðsynt

Viðmerkingar:
5. reglubrot »lat til læt
7. bls., 6. reglubrot verand til núverandi
7. bls., 7. reglubrot »ávikavist« til ávikavist.
7. bls., 10. reglubrot fakligu til fræðiligu
7. bls., 12. reglubrot hetta fer til tær fara
7. bls., 12. reglubrot 4. rgl. eini til ein
7. bls., 13. reglubrot dagin eftir, hon til dagin eftir, at hon
7. bls., 13. reglubrot avloysir til kemur i staðin fyri

Viðmerkingar:

Nevndin skal gera vart við, at talan her er bert um redaktionellar og málsligar broytingar, og tí er eingin broyting í danska lógartekstinum.

2. viðgerð 10. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 27 - 0 atkvøðum, §§ 2-19 samtykt ar við 25-0. Við 28-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

13. apríl legði skúlanevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Ein samd skúlanevnd setir fram fylgjandi broytingaruppskot til løgtingslóg um fróðskaparsetur:

1) § 13, 3. stk. verður orðað soleiðis:
»Hvørt megindeildarráð hevur 6 limir, ið verða valdir av og millum fólk, ið eru knýtt at avvarðandi megindeild. Fasta vísindastarvsliðið velur 2 umboð sínamillum, uttanseturslærarar eitt umboð sín ámillum, starvsfólkið 1 umboð sínámillum, øll fyri 3 ár í senn, og næmingarnir 2 umboð sínámillum fyri 1 ár í senn.«
2) § 15, 6. stk. verður orðað soleiðis:
»Heildarfíggjarumruppskotið fyri Fróðskapursetrið verður lagt fyri nevndina til kunningar, áðrenn tað verður sent landsstýrinum.«

3. viðgerð 13. apríl. Broytingaruppskotið til § 13 samtykt við 23-0 atkvøðum. § 13 soleiðis broytt samtykt við 26 0 atkvøðum. Broytingaruppskot til § 15 samtykt við 27-0 atkvøðum. § 15 soleiðis broytt samtykt við 27-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j. nr. 2235-1-1. Lóg nr. 65 frá 21. mai 1987.

48 Ríkislógir um avtøka av millumlanda rættarmálum um konnossementir.

Ár 1986, mikudagin 3. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstjórnini til at seta í gildi í Føroyum hjálagdu lóg nr. 628 frá 21. december 1983 »om ophævelse af lov om gennemførelse af den internationale konvention af 25. august 1924 om konnossementer« og »Industriministeriets bekendtgørelse nr. 563 af 16. november 1984 om ikrafttræden af lov om ophævelse af lov om gennemførelse af den internationale konvention af 25. august 1924 om konnossementer«.

Viðmerkingar

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfestum 20. februar 1984 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at áðurnevnda lóg verður sett í gildi.

Lov om gennemførelse af den internationale konvention (Haag-reglurnar), dagf. 25. august. 1924, var sett í gildi í Danmark við lóg nr. 150 frá 7. mai 1937, sokallaða konnossementlógin, samstundis sum sjólógin um somu reglur varð endurskoðað.

Hetta merkti, at konnossementreglurnar vórðu flættar frá sjólógini og yvir í eina sjálvstøðuga lóg - konnossementlógina.

Reglur um konnossementir skuldu í framtíðini verða broyttar á tann hátt, at fyrst skuldi konnossementlógin broytast og síðan sjólógin, sum hevði í sær tær reglur um konnossement, sum nú vegna konventiónina vórðu broyttar.

Ein ískoytisgerðarbók til Haag-reglurnar tær sokallaðu Visby-reglurnar frá 1968 varð sett í gildi við lóg nr. 294 frá 23. mai 1973 sum broytingar í sjólógini og í »loven om gennemførelse af konnossementkonventionen af 1924«.

Sostatt varð munnagongdin nú broytt. Reglurnar um konnossementir skuldi í framtíðini setast í sjólógina.

Orsøkin til hesa broyting var, at norðurlond ynsktu, at allar sjóarrættarkonventiónirnar vórðu settar í gildi í sjólógini.

Sum nú er verða broytingar í Haag-Visby-reglunum settar í sjólógina, meðan

broytingar í Haag-reglunum verða gjørdar í konnossementlógini (tví streingjað skipan).

Fyri at fáa eina »ein streingjaða skipan« í lag, nevniliga at allar broytingar av konnossementum verða settar í sjólógina, er tí neyðugt at siga Haag-konventiónina frá 1924 og konnossementlógina úr gildi.

Tvístreingjaða skipanin hevur eisini ført við sær, at ivi kann vera um, um sjóflutningur kemur undir aðra ella hinar reglurnar, og um hvørjar sjólógarreglur annars, sum eisini kunnu nýtast á økinum, tá ið sjóflutningurin stendur undir konnossementlógini, skulu galda.

Norrønur sjólógarnevndir eru á einum máli um at mæla til, at Haag-konventiónin verður søgd úr gildi við tí úrslitið, at broytingar á økinum koma inn í sjólógina.

Tí er skotið upp, at lóg nr. 150 frá 7. mai 1937 »om gennemførelse af den internationale konvention af 25. aug. 1924 om konnossementer«, sum broytt er við lóg nr. 294 frá 23. mai 1973 um broyting í sjólógini (Visby-reglurnar) og broytt við »loven om gennemførelse af konnossementkonventionen af 1954 « verður søgd úr gildi.

1. viðgerð 11. december. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Eftir áheitan frá ríkisumboðnum legði landsstýrið hin 2. desember 1986 fyri tingið uppskot til samtyktar um at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 628 frá 21. desember 1983 um avtøku av lóg um fremjing av millumtjóða sáttmála frá 25. august 1924 um farmaskjøl (konnossement) og kunngerð frá ídnaðarmálaráðnum nr. 563 frá 16. november 1984 um gilding av lóg um fremjing av millumtjóða sáttmála frá 25. august 1924 um farmaskjøl.

Í viðmerkingum landsstýrisins verður upplýst, at Haag-sáttmálin frá 1924 varð settur í gildi í Danmark við lóg nr. 150 frá 7. mai 1937 í sambandi við endurskoðan av sjólógini; hetta hevði við sær, at farmaskjalareglurnar vórðu tiknar úr sjólógini og settar í sjálvstøðuga lóg. Eftir Visby-reglunum frá 1968 (sum eru ein ískoytisgerðarbók til Haag-reglurnar) skuldi farmaskjala-sáttmálin aftur setast í sjólógina, tí at Norðurlond vildu, at allar sjórættarkonventiónir vórðu settar í gildi í sjólógini. Við tað at broytingar í Haag-Visby-reglunum nú verða settar í sjólógina, verða broytingar í sjálvum Haag-reglunum gjørdar í lóg um farmaskjøl (»konnossementslógina«). Til tess at allar broytingar í farmaskjalareglunum kunnu setast í sjólógina, má Haag-sáttmálin frá 1924 og farmaskjalalógin fara úr gildi.

Til tess at gera reglurnar greiðari eru norðurlendskar sjólógarnevndir samdar um at mæla til, at Haag sáttmálin fer úr gildi, so at allar broytingar í reglunum

koma inn í sjólógina. Í samsvari við hetta eru lóg frá 21. december 1983 og kunngerð ídnaðarmálaráðsins frá 16. november 1984 settar í gildi í Danmark.

Málið varð latið ræddarnevndini, sum hevur viðgjørt málið. Nevndin heldur tað vera hóskandi og neyðugt, at føroyingar í hesum máli hava somu reglur at ganga eftir sum hinar norðurlandatjóðirnar og onnur europeisk lond. Tað ber neyvan til í longdini hjá føroyingum í framtíðini í sjólógarmálum at virka eftir reglum, sum farnar eru í gildi í øðrum framkomnum londum, har millumtjóða nútíðar siglingarreglur hava alstóran týdning.

Nevndin mælir tí tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mars 1987. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j. nr. 1630-10.

49. Lán og keyp av húsum til landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð o.ø. (81/85).

Ár 1986, mikudagin 3. december legði skúla- og mentannarnevndin fram soljóðandi:

Álit

Í seinastu tingsetu samtykti løgtingið soljóðandi:

»Løgtingið samtykkir, at mentannar- og skúlanevndin sum millumtinganevnd heldur fram at arbeiða við løgtingsmáli nr. 81/1985 og leggur fram álit í málinum á ólavsøku 1986«.

Bakgrund fyri hesari samtykt var uppskot landsstýrisins um keyp av ávísari ogn í Tórshavn til landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð v.m.

Løgtingsins skúlanevnd helt ikki ognina vera hóskandi til endamálið og vildi

tí sleppa at kanna aðrar møguleikar.

Nevndin hevur arbeitt við málinum saman við umboðum fyri Løndsskúlafyrísitingina og arkitekti frá arkitektafyritøkun A-Plan.

Ymiskir møguleikar hava verið kannaðir. Serstakliga er bygningurin við Hoyvíksvegin, sum tríggir almennir grunnar hava keypt, kannaður.

Í hesum bygningi eru sostatt umleið 1000 m² tøkir til endamálið.

Landsskúlafyrisitingin heldur hølini vera væl hóskandi til landsmiðstøð. Í kjallaranum eru goymslurum soleiðis, at miðstøðin eisini fær hýst Bókamiðsøluni.

A-Plan hevur saman við Skúlafyrisitingini gjørt dispositiónsætlan fyri hølini, og er skúlanevndin kunnað við hesa ætlan.

Skúlanevndin hevur fingið at vita, at ánararnir eru sinnaðir at lata Føroya Landsstýri koma inn sum fjórða eigara í bygninginum, men grunnarnir eru ikki førir fyri at upplýsa kostnaðin av hesum enn.

Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð er fyriskipað í fólkaskúlalógini frá 1979, og tað má tí haldast at vera upp á tíðina, at hon fæst at virka.

Til raksturin av landsmiðstøð eru játtaðar 1,5 mill. kr. fyri 1986. Á uppskoti landsstýrisins til løgtingsfíggjarlóg 1987 eru settar 1,9 mill. kr. Av hesum eru tær 840.000 kr. ætlaðar til keyp av bókum og undirvísingaramboðum, meðan restin fer til rakstur.

Ein meiriluti í skúlanevndini (Hergeir Nielsen, Hilmar Kass, Jóannes Dalsgaard og Eilif Samuelsen) er komin til ta niðurstøðu, at tikið eigur at vera av teimum hølunum, sum standa miðstøðini í boði, t.v.s. kjallari og 2/3 av miðhæddini í húsum á matr. nr. 1315^{b} við Hoyvíksvegin.

Meirilutin mælir til, at hølini í fyrsta umfari verða leigað, men leggur samstundis dent á, at fermetraprísurin ikki eigur at fara upp um tað, ið verður latið fyri tilsvarandi høli á privata marknaðinum.

Meirilutin ger samstundis vart við, at tað beinasta má vera, at landið fær hølini til ognar skjótast til ber.

Út frá hesum setir sami meiriluti fram fylgjandi:

Uppskot

til

samtyktar

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum í fyrstu syftu av leiga umtalaðu høli á matr. nr. 1315^{b} við Hoyvíksvegin skjótast gjørligt til landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð.
2. Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við Menningargrunnin, Húsalánsgrunnin og Lønjavningargrunnin um keyp av nevndu hølum og áleggur samstundis landsstýrinum í seinasta lagi 1. oktober 1987 at útvega sær neyðturviliga heimild til nevnda keyp.

Ein minniluti (Óli Breckmann) vísir á, at av tí at eingin kostnaðarmeting er fingin av ístandseting av bygninginum til nevna endamál, tekur minnilutin støðu í salinum.

2. viðgerð 3. februar. Formaðurin boðaði frá broytingaruppskoti frá Svend Aage Ellefsen, sum var soljóðandi:

Broytingaruppskot

1. Álagt verður landsstýrinum at finna hóskandi høli uttan fyri høvuðsstaðin til landsmiðstøð fyri undirvísingarumboðum.
2. Heitt verður á landsstýrið at skipa so fyri, at nýggir almennir stovnar, í tann mun tað kann sameinast við virksemi teirra, verða lagdir úti á bygdunum.

Viðmerkingar:

Undir 1. viðgerð mælti undirritaði til, at málið varð beint í skúlanevndina til tess at fáa kannað, um ikki hóskandi høli vóru tøk til landsmiðstøðina fyri Undirvísingarumboðum uttanfyri høvuðsstaðarøkið.

Sambært álitið frá nevndini eru hesi viðurskiftini — »av tí at málið hevur skund« — ikki kannaðir, og verður aftur mælt til at leggja landsmiðstøðina í Tórshavn.

Ferð eftir ferð verður — bæði av kommunalpolitikkarum eins væl og landspolitikkarum — víst á, í hvussu stóran mun miðsavningarpolitikkurin hjá sitandi samgonguni, fær skaðiligt árin á bygnaðin av føroyska bygdasamfelagnum.

Meðan peningastreymurin til miðstaðarøkið økist í stórum, verða bygdirnar í størri og størri mun við sviðið soð. Eitt nú kann vísast á, at landsstýrið og løgtingsmeirilutin árliga játta yvir 100 almenn størv í Suðurstreymoy, meðan tað, sum játtað verður úti um landið, kann teljast á fingrunum, uttan at teir allir nýtast verða viðtaldir.

At kalla allir nýggir stovnar verða lagdir í ella kring Tórshavn.

Nevnast kunnu sum dømi fyriliggjandi uppskot um landsmiðstøðina ella komandi menningarstovuna, fiskirannsóknarstovuna og hálkubreytina fyri bert at nevna nakrar av teimum, sum í løtuni eru upp á tal.

Eisini búskaparpolitikkur samgongunnar ber á sama borðið.

Meðan tær játtanir á figgjarlógini, sum í høvuðsheitinum fara út á bygd, verða niðurskornar at merginum, t.d. játtanir til havnir, lendingar, studnings- og landsvegir, menningargrunnurin, grunnin til iðnaðarfremjandi endamál, studningin til fiskivinnuna o.s.fr., so bólgna upphæddirnar til landsfyrisiting, til almennu stovnarnar, heilsumál, skúlafyrisiting, vísindi, búkmentir, list o.s.fr. ella til allar tær konti, har meginpartur av peninginum fellur í Suðurstreymoy uttan fyrilit. Nýggju inntøkulógirnar medvirka jú eisini í ovurstóran mun til kapitalflutningin av bygd til bý.

Útlitið av hesum politikkinum gerst alt klárari, og hóast Tórshavnar býráð

leggur almikla orku í at útvega nýtt byggiøki til tilflytarar o.o., so klára teir valla at halda tørn.

Mungir eru teir, sum tosa og skriva um at broyta hesa gongd, men trupult tykist vera at fáa orðini staðfest við gerðum.

T'd. kan vísast á, at hóast Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, ikki minni enn tvær ferðir hevur boðað umboðum fyrl Føroya Kommunufelag frá, at Lønjavningargrunnurin skuldi flytast vestur í Vágar, so hevur tað ikki enn eydnast honum at fáa loyst spurningin. T'vørturímóti, hevur meirilutin í landsstýrinum yvir høvdið á honum, loyvt lønjavningargrunninum at keypt umtalaða húsaognina við Hoyvíksvegin í T'órshavn.

Jú, miðsavnan og miðspjaðing er mangan til umrøðu, — tó aloftast uttan at nakað úrslit fæst burturúr so ella so.

Nú skulu so aftur fleiri nýggir stovnar leggjast í Suðurstreym, hóast teir eins væl kundu ligið úti kring landið.

Fyriliggjandi uppskot um at áleggja landsstýrinum at finna annað egnað stað til landsmiðstøðina og annars framoftir í størri mun at reka ein politikk, sum miðspjaðir heldur enn miðsavnar, verða sett fram í vón um, at ein meiriluti finst á Føroya Løgtingi, sum ynskir at benda menningini av samfelagi okkara tann vegin.

15. december 1986 legði mentannar- og skúlanevndin fram soljóðandi:

Álit II

Málið er lagt fram av løgtingsins mentannar- og skúlanevnd tann 3. december 1986 og snýr seg um útvegan av hølum til landsmiðstøð fyri undirvísingarumboð v.m.

Málið varð eftir 1. viðgerð beint aftur í skúlanevndina, sum hevur viðgjørt málið av nýggjum. Undir 1. viðgerð varð ynski sett fram um at fáa kannað aðrar møguleikar, enn tann í áliti I nevnda.

Nevndin er samd um, at málið hevur skund, og at tað ikki kann haldast at vera møguligt at finna betur høli, enn tey sum meirilutin í nevndini peikaði á í sínum áliti, framlagt 3. december 1986.

Sostatt mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar, soleiðis sum hetta varð sett fram av einum meiriluta í áliti I framlagt 3. december.

Framhaldandi 2. viðgerð 4. mars 1987. Uppskotini frá Svend Aage Ellefsen fall við 5-0 atkvøðum og við 15-0 atkvøðum. Uppskotið frá meirilutanum samtykt við 19-0 atkvøðum.

50 Norðurlendskur sáttmáli um vinnuútinnan fyri ávísar starvsbólkar innan heilsuverkið og djóralæknafrøðiverkið

Ár 1986, hósdagin 11. december legði Lassi Klein, landsstýrismaður fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at uttanríkismálaráðsins kunngerð dagfest 19. mars 1982 viðvíkjandi millumlanda sáttmála frá 25. august 1981 millum Danmark, Finland, Noreg og Svøríki um góðkenning av vinnuútinnan fyri ávísar starvsbólkar innan heilsuverkið og djóralæknafrøðiverkið verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 8. august 1986 spurt, um millumtjóða sáttmálin millum norðanlond um vinnuútinnan fyri ávísar starvsbólkar innan heilsu- og djóralæknafrøðiverkið kann lýsast í Føroyum.

Landslæknin hevur í skrivi dagfest 2. oktober 1986 mælt til, at nevndi sáttmáli verður lýstur at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við tilmæli til, at sáttmálin verður lýstur at galda í Føroyum.

1. viðgerð 3. februar 1987. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 24. mars legið fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fyri tingið av Føroya landsstýri, ið mælir til at kunngerð uttanríkismálaráðsins dagf. 19. mars 1982 viðvíkjandi millumlandasáttmála frá 25. august 1981 millum Danmark, Finland, Noreg og Svøríki um góðkenning av vinnuútinnan fyri ávísar starvsbólkar inna heilsuverkið og djóralæknafrøðiverkið verður lýst at galda í Føroyum.

Alt síðan norðurlandaráðið varð skipað, hava ymiskir starvsbólkar í norður-

londum havt sínámillum avtalur, ið førdu við sær, at virkast kundi í øllum norðurlondum. Læknar hava havt sína egnu avtalu eins og apotekarar. Hesir sáttmálar eru gamlir og falla burtur í samband við hesa kunngerð.

Ísland er ikki við í hesum sáttmála. Á síðu 7 í kunngerðini, art. 33, stendur, at Ísland kann vera við í hesum sáttmála, og at, um so verður, kann Ísland krevja, at tann, ið søkir góðkenning, hevur rímiligan kunnleika um íslendska málið.

Tað er ein samd nevnd, ið tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

3. viðgerð 27. mars. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 940-2.

51 Broyting í løgtingslóg um býti av rakstararavlopi landskassans.

Ár 1986, mánadagin 15. december legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin, fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býti av rakstararavlopi landskassans.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 5 frá 25. januar 1973 um býti av rakstararavlopi landskassans verður § 1 orðað soljóðandi:

»Av rakstararavlopi landskassans fullu í minsta lagi 2/3 setast á bundna konto uttan fyri Føroyar og verða standandi uttanlands í minst 4 ár.«

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fordeling af landskassens driftsoverskud.

§ 1.

I lagtingslov nr. 5 af 25. januar 1973 om fordeling af landskassens driftsoverskud affattes § 1 således:

»Af landskassens driftsoverskud skal mindst 2/3 indsættes på spærret konto uden for Færøerne, og være placeret udenlands i mindst 4 år.«

§ 2.	*§ 2.*
Henda lóg fær gildi frá rakstrarári landskassans 1986.	Denne lov træder i kraft fra begyndelsen af landskassens driftsår 1986.

Viðmerkingar:

Tað sýnist greitt, at higartil galdandi reglur um býti av rakstraravlopi landskassans ikki eru hóskandi, aftaná at tað í byrjanini av áttatiárunum eydnaðist, fyrst at fáa javnvág í, og seinri at fáa munandi yvirskot á landskassarokningini.

Tær stóru produktivu íløgur, sum vórðu gjørdar í nevnda tíðarskeiði, hava náttúrliga ført við sær, at inntøkurnar hjá landskassanum øktust munandi.

Hertil kemur, at nýggja landsstýrið hevur mist tamarhaldið á teimum almennu og óproduktivu íløgunum og harvið skapt eitt óvanligt trýst á føroyska arbeiðsmarknaðin. Hetta førir eisini í fyrstu atløgu til størri inntøkur hjá landskassanum. At tað upp á eitt sindur longri sikt er ein sera óheppin gongd, er ein onnur søga.

Endaliga hevur landsstýrið fyri stuttum sett í verk nýggjar inntøkulógir, sum sjálvandi geva enn størri inntøkur til ein landskassa, sum frammanundan hevur yvirskot.

Tað er tvingandi neyðugt at tryggja, at hesin yvirskotslikviditetur landskassans verður tikin burtur út peninganýtsluni í Føroyum. Hendir tað ikki, verða avleiðingarnar enn størri nýtsla, bæði á privata og á almenna økinum. Og hetta fær óhepnar avleiðingar fyri samfelagsbúskapin.

Verður peningurin bundin uttan fyri Føroyar, gevur hetta fleiri fyrimunir. Fyri tað fyrsta verður bæði almenna og privata nýtslan tálmað, og fyri tað næsta kemur innistandandi uttanlands at minka í stórum um okkara nettouttanlandsskuld.

1. viðgerð 3. februar 1987. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum 15. december 1986 og undir 1. viðgerð tann 3. februar 1987 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) tekur ikki undir við uppskoti Sambandsfloksins og vísir á løgtingsmál 112/1986: Avtøka av lóg um býti av rakstraravlopi landskassans.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir á

løgtingsmál nrø 19/1986: Avtøka av løgtingslóg um býti av rakstraravlopi lands kassans.

2. viðgerður 9. apríl 1987. § 1 fall við 5-0. Málið sostatt burturdottið.

52 Ferðafólka- og farmafar til Mykines- siglingina.

Ár 1986, mánadagin 15. december legði Lassi Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um ferðafólka- og farmafar til Mykines-siglingina.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa ella byggja fólka- og farmafar til farleiðina Mykines og landskassans vegna at taka neyðug lán.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, sum hon er kunngjørd.

lagtingslóg om passasager- og fragtfartøj til sejladsen på Mykines.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe eller at lade bygge et passager- og fragtfartøj til reten til Mykines og til på landskassens vegne at optage det nødvendige lán.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:
landsstýrið hevur samtykt at leggja fyri løgtingið lógaruppskot um heimild at lata byggja ella keypa ferðafólka- og farmafar til farleiðina út í Mykines.

Síðani 1967 hevur »Súlan« rakt farleiðina sjóvegis, meðan »Snípan« hevur flogið farleiðina frá december 1983, 5 ferðir um vikuna.

»Súlan« er bygd í 1930 í Frederikssund úr eik, hon er 12,13 br. reg. t. og 5,17 netto, hon hevur ein 64 hk. Bukh Diesel frá 1969. Ferðafólkaloyvið var 20. Báturin varð lagdur í mai mánaði 1986 og seldur. Í staðin fyri hana varð »Ljósáfossur«, leiðuður til summarsiglingina. Hann er ein Vikusundbátur, bygdur í 1980 úr glasfibur 17,49 br. reg. t. 4,86 netto, hann hevur ein 200 hk. Cummins frá 1980. Ferðafólkaloyvi var 20 merktur sum fiskibátur, men hevði hann verið merktur sum P-bátur, hevði loyvið verið 30-40, sigur skipasýnið.

Sum er, er eingin bátur í Mykines siglingini.

Strandferðslan sigur frá, at ætlanin er at fáa eitt álítandi samband eisini sjóvegis. Tyrlan er góð, men hevur hon avmarkaðar møguleikar, sum tá tað snýr seg um at flyta meira enn 3.000 ferðafólk um mánaðin.

Eisini verður nevnt flyting av stórdýrum, byggitilfari, maskinum til landbúnaðin o.t., har flutningur við tyrluni ikki letur seg gera.

Strandferðslan hevur fingið tilboð um 40' ferðafólkafar 12 m til longdar, breidd 4 m, djúpd 1,95 m, ferð 9 míl. Ferðafólkatal 36. Kostnaður við eykaútgerð verður um 2,1 mió. kr. Av tí at byggitíðin er 6 mánaðir í minsta lagi, og báturin eigur at vera klárur til summarsiglingina, er umráðandi at fáa ein skjóta avgerð.

Skipaeftirlitið sigur frá, at ferðafólkafar gjørd úr glasfibur verður góðkent, um farið lýkur ávís eykakrøv.

1. viðgerð 3. februar 1987. Málið var beint í samferðslunevnina, sum 2. mars legði fram soljóðandi.

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 15. december 1986 og undir 1. viðgerð tann 3. februar 1987 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Strandferðsluna og skiparan, ið rekir Mykinessiglingina.

Á fundinum kom m.a. fram, at siglingin til Mykinesar við líknandi glasfiburbáti hevur roynst væl, og at slíkur bátur er væl egnaður til umtalaðu sigling, og til ey lendingarvíðurskifti, sum gera seg galdandi í Mykinesi.

Upplýst hevur verið at keypsprísurin er um 2,1 mió. kr., og er nevndin av teirri áskoðan, at lógin eigur at tilskila, hvussu mikið kann takast í láni, heldur enn at orða heimildina soleiðis, at takast kunnu neyðug lán.

Hetta orsakað vána royndir í samband við kostnaðarmetingar og veruligan kostnað tá avtornaði fyri bygningar eins væl og skipakeyp hjá tí almenna.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður sett í staðin fyri »taka nøðug lán« fylgjandi: »taka í mesta lagi 2,1 mió. kr. í lán«.	*I § 1 indsættes i stedet for »optage det nødvendige lån« følgende: »optage maksimalt 2,1 mio. kr. i lån«.*

2. viðgerð 5. mars 1987. Broytingaruppskotið frá samferðslunevndini til § 1 varð samtykt við 28-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 29-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. mars. Málið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1824-12.

53 Broyting í løgtingsvallógini.

Ár 1986, mánadagin 15. december legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

§ 1.	*§ 1.*
Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes lagting foretages følgende ændringer:
1. § 2 verður orða soleiðis: »Valrætt til løgtingið hava tey, ið hava fylt 28 ár, hava heimarætt og fastan bústað í Føroyum.	1. § 2 affattes således: »Valgret til lagtinget har personer, der er fyldt 18 år, har indfødsret og fast bopæl på Færøerne.

2. stk. Valbær til løgtingið eru tey, sum hava valrætt til tingið, uttan so at viðkomandi er straffaður fyri gerð, sum í vanligum umdømi ger hann óverdan at vera løgtingslimur, um ikki henda fylgja av dóminum er burturfallin. Straffverd gerð ger ikki hin dømda óverdan, uttan so at hin dømdi er dømdur treytaleysan dóm til fongsul í 4 mánaðir ella meira ella varðhald, ella tá ið 5 ár eru gingin aftaná, at hann hevur sitið straffin av, straffurin er avoldaður ella eftirgivin, ella eftir at hann er endaliga leysur av varðhaldi.

3. stk. Einin kann atkvøða, uttan hann er á vallista.«

2. § 5 verður orðað soleiðis:
»Vallistarnir verða gjørdir, tá ið val er útskrivað, við fólkayvirlitinum sum grundarlag. Á vallistan verða skrivaðir teir persónar, sum valdagin lúka aldurstreytina og hinar treytirnar fyri valrætt.«
3. § 6, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Í seinasta lagi eina viku aftan á at valið er útskrivað, skulu vallistarnir leggjast fram til alment eftirlit í eina viku á einum staði ella eftir umstøðunum á fleiri støðum í kommununi, sum liggja høgaliga fyri hjá íbúgvunum. Hetta verður kunngjørt á vanligan hátt frammanundan.«
4. § 6, 2. stk., gongur út og núverandi 3. stk. verður 2. stk.
5. § 7 verður orðað soleiðis:
»Kæra um at onkur ikki er komin á listan ella at onkur av órættum er tikin við, skal í seinasta lagi 4 dagar eftir, at framløgufreistiu er úti,

Stk. 2. Valgbar til lagtinget er enhver, som har valgret til dette, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør han uværdig til at være medlem af lagtinget, uden at denne virkning af dommen er bortfaldet. En strafbar handling gør ikke den dømte uværdig, medmindre domfældte er idømt ubetinget straf af fængsel i 4 måneder eller derover eller forvaring, eller når der er forløbet 5 år fra straffens udståelse, forældelse eller eftergivelse eller fra den endelige løsladelse fra forvaring.

Stk. 3. Ingen kan afgive stemme uden at være optaget på valglisten.«

2. § 5 affattes således:
»Valglisterne udfærdiges, når valg er udskrevet, med folkeregistreret som grundlag. På valglisten føres de personer, som valgdagen opfylder aldersbetingelser og de andre betingelser for valgret.«
3. § 6, stk. 1, affattes således:
»Senest en uge efter at valget er udskrevet, skal valglisterne fremlægges til offentligt eftersyn i en uge på et eventuelt flere for kommunens beboere bekvemme steder. Dette bekendtgøres forud på sædvanlig måde.«
4. § 6, stk. 2, udgår og nuværende stk. 3 bliver stk. 2.
5. § 7 affattes således:
»Klage over, at en ikke er optaget på listen eller at en uberettiget er optaget på listen, må senest 4 dage efter fremlæggelsesfristens udløb skriftlig indgives til bygderådet/by-

skrivliga sendast bygdarráðnum/býráðnum, sum á fundi í sini asta lagi 10 dagar eftir, at klagufreistin er úti, tekur avgerð í málinum.

2. stk. Vísir tað seg sjálvt, at fleiri eru í listanum, soleiðis at ein ella fleiri persónar ikki eru komnir á hendа, kann bygdaráðið/býráðið á fundi í sínasta lagi dagin fyri valið rætta tílíkar feilir.«

6. §§ 9-11 ganga út.

7. § 15, 3. stk., verður orðað soleiðis:

»Tá ið val til løgtingið skal fara fram, boðar løgtingsformaðurin í seinasta lagi 5 vikur áðrenn valið landsstýrinum frá, hvørjir flokkar við seinasta løgtingsval fingu umboðan á tingi og framvegis eru umboðaðir har. Í seinasta lagi kl. 18.00 5 vikur, áðrenn valið fer fram, kunnu í minsta lagi 800 veljarar boða landsstýrinum frá stovnan av nýggjm flokki, sum tekur lut í valinum.«

8. § 15, 5. stk. verður orðað soleiðis:

»5. stk. Frábodan um stovnan av nýggjum flokki er galdandi til fyrstkomandi val fer fram, tó í minsta lagi í eitt ár frá frábodannardegnum.«

9. Í § 17, 4. stk., ganga út orðini »Stillararnir kunnu eisini undirskriva á árit av vallistanum.« og í staðin verður sett: »Valevnini og stillararnir kunnu eisini undirskriva á avrit av valevnislistanum. Eisini kunnu valevnini í staðin fyri við undirskrift, vátta sína uppstilling við brævi, fjarriti, telexi o.tl.«

10. Í § 38, 2. stk. verða orðini »atkvøðuseðil til løgtingsval« broytt til: »atkvøðuseðil«.

rådet, som på et møde senest 10 duge efter klagefristens udløb træffer afgørelse i sagen.

Stk. 2. Viser det sig senere, at en eller flere personer på grund af fejl ved listens udarbejdelse ikke er optaget på denne, kan bygderådet/byrådet i et møde senest dagen før valget berigtige sådanne fejl.«

6. §§ 9-11 udgår.

7. § 15, stk. 3 affattes således:

»Stk. 3. Når valg til lagtinget er udskrevet, meddeler lagtingets formand senest 5 uger før valgets afholdelse landsstyret, hvilke partier, der ved sidste lagtingsvalg opnåede repræsentation i lagtinget og forsat er repræsenteret i dette. Senest kl. 18.00 5 uger før valgets afholdelse kan mindst 800 vælgere meddele landsstyret, at de agter at deltage i valget som nyt parti.«

8. § 15, stk. 5, affattes således:

»Stk. 5. Anmeldelse af et nyt parti har gyldighed indtil afholdelse af førstkommende lagtingsvalg, dog mindst i et år fra anmeldelsens dato.«

9. I § 17, stk. 4, udgår ordene »Stillerne kan også underskrive på afskrifter af kandidatlisten« og i stedet indsættes: »Kandidaterne og stillerne kan også underskrive på kopier af kandidatlisten. Også kan kandidaterne i stedet for ved underskrift, bekræfte deres opstilling ved brev, telegram, telex o.l.«

10. I § 38, stk. 2, ændres ordene »stemmeseddel til lagtingsvalg« til: »stemmeseddel«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

2. stk. Broyting nr. 7 (§ 15, 3. stk.) er ikki galdandi fyri komandi løgtingsval fyri flokkar, ið eru fráboðaðir og góðkendir á løgtingi, áðrenn henda lóg kemur í gildi.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Stk. 2. Ændring nr. 7 (§ 15, stk. 3) gælder ikke for førstkommende valg for partier, der er anmeldt og godkendt af lagtinget, før denne lovs ikrafttræden.

Viðmerkingar:

Reglurnar um valrættaraldurin og valhæri til løgtingið eru ásettar bæði í stýrisskipanarlógini og løgtingsvallógini.

Í tingsetunum 1983 og 1984 vórðu samtyktar broytingar í stýrisskipannarlógini (løgtingslóg nr. 2 frá 31. januar 1985 um m.a. lækking av valrættar- og valhæarisaldrinum niður í 18 ár).

Fyri at samsvar framvegis skal vera millum stýrisskipanarlógina og løgtingsvallógina vali viðvíkjandi verður ti skotið upp, at geva § 2 í løgtingsvallógini sama orðaljóð sum stýrisskipannarlógin hevur fingið.

Til hesa og aðrar broytingar, ið samstundis verður skotið upp at gera í vallógini, skal viðmerkjast fylgjandi:

Ad 1.: Treytirnar fyri valrætti eru nú bert tær, at ein hevur fylt 18 ár, hevur heimarætt og fastan bústað í Føroyum. Reglurnar um, ein ikki mátti vera revsaður við ávísari strangari straff, ikki vera gjørdar ómyndugur, verða undir trota búarviðgerð ella hava móttikið fátækrastuðning verða avtiknar.

Viðvíkjandi valbæri verða tó framvegis ávísar reglur um straff galdandi, sum kunnu gera ein óverdugan at vera løgtingslimur.

Ad 2.-6.: Eftir núgaldandi reglum skulu løgtingsvallistarnir gerast á hvørjum ári í januar mánaði og leggjast fram til alment eftirlit. Harumframt skulu løgtingsvallistarnir eisini leggjast fram tey árini, løgtingval fer fram beint aftaná, at val er útskrivað.

Tað verður mett at vera óneyðugt arbeiði at skulu gera vallistar hvørt ár. Freistin fyri útskriving av vali er 6 vikur, og eitt er til hindurs fyri, at vallistarnir verða gjørdir og framlagdir beint eftir, at valið er útskrivað. Tær flestu stóru kommununrnar hava sítt fólkayvirlit inni á teldutóli, sum kann skriva valevnislistarnar, og tær kommunur, sum ikki hava teldu-tól, kunnu bíleggja valevnislistarnar frá landsfólkayvirlitinum, um tær yaskja hetta.

Ad 7.: Í § 15, 3. stk. um fráboðan um flokkar og stovnan av nýggjum flokkum er ikki samsvar millum danska og føroyska tekstin. Skotið verður tí upp at broyta føroyska tekstin, so hann samsvarar við tann danska, soleiðis at eingin ivi kann vera um, at tann møguleiki, sum løgtingslimir hava til løgtingsformannin at boða frá nýggjum flokki, ikki er til staðar longur. Henda regla er ikki galdandi fyri flokkar, ið longu er góðkendir, smbr. § 2, stk. 2.

Viðmerkt kann verða, at møguleikin hjá fólkatingslimum at boða frá nýggjum flokki varð avtikin í 1965, og er tað nú altið neyðugt við innsavnan av undirskriftum.

Ad 8.: Fráboðan av nýggjum flokki er galdandi til fyrstkomandi val, men um val aftur fer fram innan eitt ár frá fráboðannardegnum, er ikki neyðugt við innsavning av undirskriftum av nýggjum. Í galdandi lóg er ikki samsvar millum føroyska og danska tekstin.

Ad 9.: Eftir § 17, 5. stk. skulu valevnislistarnir undirskrivast av valevnum sjálvum. Valevnislistarnir verða sum oftast gjørdir í seinastu løtu og tað hevur tí víst seg trupult at fáa fatur á undirskriftum frá valevnunum, sum eru til sjós. Skotið verður tí upp, at valevnini kunnu góðkenna teirra uppstilling á annan hátt enn við beinleiðis undirskrift á sjálvan valevnislistan, t.d. í brævi, fjarriti ella telexi.

Ad 10.: Atkvøðutilfar til brævatkvøður til løgtingsval og kommunuval er felags, soleiðis at tann eina síðan á atkvøðuseðlinum er til løgtingsval og hin til bygda-/býráðsval og skúlanevndarval. Á fylgisskrivinum og á uttara brævhjálvanum verður krossað av, um atkvøðan viðvíkir løgtingsvali ella kommunuvali.

Í § 14 í kommunuvallógini verður viðvíkjandi brævatkvøðugreiðslu víst til galdandi reglur um brævatkvøður til løgtingsval.

Føroya Kommunufelag hevur gjørt vart við, at núverandi atkvøðuseðlar kunnu føra við sær mistøk, men tekur felagið undir við uppskotinum um, at ein atkvøðuseðil verður nýttur, sum bert verður merktur »atkvøðuseðil«. Neyðugar broytingar mugu so gerast í fylgiskrivinum og uttara brævbjálvanum.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið hin 15. december 1986. Við 1. viðgerð hin 5. februar 1987, varð málið beint í rættarnevndina, og hevur tingið viðgerð hat.

Galdandi løgtingslóg um val til Føroya Løgting er løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978. Men við tað, at reglurnar um valrættaraldur og valbæri til løgtingið eru ásettar í stýrisskipannarlógini, vórðu í tingsetunum 1983 og 1984 samtyktar broytingar í stýrisskipannarlógini, sambr. løgtingslóg nr 2 frá 31. januar 1985 um m.a. lækking av valrættar- og valbærisaldri niður í 18 ár.

Til tess, at samsvar skal vera millum stýrisskipannarlógina og løgtingsvallógina um val til løgtingið, skjýtur landsstýrið upp, at § 2 í løgtingsvallógini fær sama orðaljóð sum stýrisskipannarlógin nú hevur.

Skotlið verður upp at ganga burtur frá at gera vallistar hvørt ár, tí at vallistar lættliga í dag kunnu gerast frá tí, at val er útskrivað, til tað verður hildið, t.v.s. innan 6 vikur.

Harumframt verða nú heilt greiðar reglur fyri fráboðan um flokkar og stovnan av nýggjum flokkum, við tað at nú verður samsvar millum tann føroyska og tann danska tekstin í verandi løgtingsvallóg.

Eftir uppskotinum skal nú bera til hjá valevnum við t.d. brævi, fjarriti ella telexi at góðkenna uppstillingina, um tey eru burturstødd, meðan eftir galdandi skipan undirskrift er neyðug.

Rættarnevndin heldur nevndu broytingar og aðrar smærri broytingar, sum nevndar eru í uppskotinum, vera hóskandi, og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minnilutin (Eilif Samuelsen) mælir eisini til at broyta vallógina soleiðis, at talið av eykaumboðum verður hækkað úr 5 upp í 10, og setir sostatt fram fylgjandi:

Broytingaruppskot

til uppskot landsstýrisins

Í § 1, 1. punktum, verður »hægst 32« broytt til »hægst 37« og í seinasta punktum verður »5 limir« broytt til: »10 limir.«	I § 1, 1. punktum ændres »højst 32« til: »højst 37« og i sidste punktum ændres »5 medlemmer« til: »10 medlemmer.«
Í § 32, stk. 1, verður »5« broytt til: »10«.	I § 32, stk. 1, ændres »5« til: »10«.
Í § 32. stk. 5, verður »5« broytt til: »10«.	I § 32, stk. 5, ændres »5« til: »10«.

2. viðgerð 10. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 26-0 atkvøðum, § 2 varð samtykt við 26-0. Broytingaruppskotið frá minnilutanum í rættarnevndina fall við 12-1 atkvøðum. Við 28-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 13. apríl. Málið endaliga samtykt við 29-1 atkvøðum.

F. L. j. nr. 113-1. Lóg nr. 42 frá 5. mai 1987.

54 Keyp av húsaognum (landslæknahúsini).

Ár 1987, mikudagin 18. februar legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av húsaognum.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa og innrætta ognina matr. nr. 943 í Tórshavn.

§ 2. Játtaðar verða kr. 5 mió., sum verða at leggja út úr landskassanum ella fíggjast við lánupptøku.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om køb af husejendomme.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe og indrette matr. nr. 943 i Tórshavn.

§ 2. Der bevilges hertil kr. 5 mill. som betales af landskassen eller finansieres ved optagelse af lån.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Í longri tíð hevur verið søknast eftir hølum til ymiskar stovnar innan heilsuverkið, t.d. heilsu- og heimasjúkrasystraskipanina og hjálpartólaniðstøð.

Ríkisumboðið hevur nú boðið landsstýrinum at keypa gomlu landslæknahúsini, nú tey ikki longur skulu nýtast til hústað. Tilboðið ljóðar upp á ein prís eftir meting av metingarmonnum fyri Føroya Sparikassa.

Metingin er kr. 2.920.000, og arkitekt- og planleggingarvirkið A-plan metir, at kostnaðurin av umvæling og innrætting fer at liggja umleið 2.100.000 kr.

Ríkisumboðið ynskir at leiga tann partin, sum landslæknin hevur viðtalu í. Talan er um 60 m² til vanliga skrivstovuleigu.

1. viðgerð 3. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 13. apríl legði fram álit:

Sí álitið í løgtingsmáli nr. 32: Keyp av húsaognum (felagsálit í málunum 32, 54 og 105).

2. viðgerð 14. apríl. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 32 Keyp av húsaognum og 105 Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu. § 1 varð samtykt við 22-0 atkvøðum, §§ 2 og 3 samtyktar við 22-0 atkvøðum. Við 21-0 atkvøðum varð samtykt at beina málini soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2427-14. Lóg nr. 31 frá 30. apríl 1987.

55 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.

Ár 1986, mánadagin 15. december legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Í Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir ganga út §§ 27-29.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1987.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om tjenestemandspensioner.

§ 1.

I lagtingslog nr. 32 af 5. juli 1971 om tjenestemandspension ophæves §§ 27 29.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1987

II. Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka úr gildi fyri Føroyar reglurnar í donsku lógini um tænastumannaeftirlønir um samskipannarfrádrátt, soleiðis at hesin frádráttur heldur uppat 1. januar 1987 ella í seinasta lagi, tá ið blokkstuðulsskipanin verður framd.

Tá ið føroyskir tænastumenn, herundir eisini fólkaskúlalærarar, koma til pensjónsaldur og eisini skulu hava fólkapensjón, verður pensjónin minkað við upp til 74 % av fólkapensjónsupphæddini. Sama er galdandi fyri teir persónar, sum sambært serliga skipan fáa 2/3 av pensjónini, tí teir ikki formliga vóru tænastumenn. Eisini einkjueftirløn, aftaná at tænastumaðurin er deyður, verður skerd við nevnda parti av fólkapensjónini.

Allir aðrir borgarar landsins kunnu hava pensjónsskipanir til tryggjan av inntøku á gamalsaldrinum, uttan at fólkapensjónin verður skerd. Prinsippið, um at øll skulu hava fólkapensjónsgrundupphæddina óheft av aðrari inntøku, er tí brotið, tá ið tað snýr seg um hendan bólkin av fólki. Tey eru kanska ikki so ógvuliga mong í tali, men fyri tann einstaka merkist hetta fíggjarliga umframt órættvísið, sum liggur í hesi skipan.

Danir hava somu skipan, men teir hava sæð tað órímuliga í henni, og eru tí í ferð við at avtaka hana.

Fyri okkara viðkomandi kann hetta gerast við at broyta lógina um tænastumannaeftirlønir, og tá ið tað snýr seg um skúlalærarar og møguliga aðrar »hálvføroyskar« tænastumenn, kann hetta best gerast, nú lógarbroytingar kortini skulu gjøgnumførast í samband við, at blokkstuðulsskipan verður sett í verk.

Uppskot okkara er tí í tveimum pørtum, annar snýr seg um at broyta løgtingslógina, og hin er uppskot til samtyktar, sum áleggur landsstýrinum at gera tilsvarandi broyting, tá lógarbroytingarnar í samband við blokkstuðusskipanina verða framdar.

1. viðgerð 11. februar. Málið varð beint í almenna- og heilsunevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi:

Álit I

Málið er framlagt av Fólkaflokkinum 15. december 1986 og varð aftaná 1. viðgerð hin 11. februar 1987 beint í almanna- og heilsunevndina.

Høvuðsmálið snýr seg um samskipannarfrádráttin, tá ein tænastumaður bæði fær tænastumannaeftirløn og fólkapensjón. Øll arbeiðsárini gjalda vit inn

til fólkapensjónina, og allir borgarar í landinum fáa fólkapensjónsgrundgjaldið uttan mun til, hvussu stórar inntøkur teir annars hava.

Øðrvísi, er tá talan er um tænastumenn. Tænastumannaeftirlønin verður minkað við upp til 74 % av fólkpensjónsupphæddini. Her skulu vit kanska leggja okkum í geyma, at tað ikki er fólkapensjónin, ið verður skerd, men tænastumannaeftirlønin, sum verður skerd við hesi upphædd. Tá hetta uppskot varð lagt fyri lógkønan í umsitingini, so varð sagt, at uppskot Fólkafloksins ikki er ein spurningur um sociala pensjón, men ein lønarspurningur hjá tænastumonnum. Tessvegna verður málið mett at hoyra heima í fíggjarnevndini. Mælt verður tí til, at málið verður beint í fíggjarnevndina.

Ein samd almanna- og heilsunevnd setir tí soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskotið til samtyktar frá samdari almanna- og heilsunevnd varð samtykt við 20-0. Uppskotið varð hereftir beint í fíggjarnevndina, sum 14. apríl legði fram soljóðandi:

Álit II

Málið varð lagt fram á Fólkaflokkinum hin 15. december 1986 og varð aftaná 1. viðgerð hin 11. februar 1987 beint í almanna- og heilsunevndina.

Ein samd almanna- og heilsunevnd hevur beint málið í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Signar Hansen, Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Anfinn Kalsberg) vísir til tingmál nr. 106/1986: Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir og mælir til at samtykkja fyriliggjandi lógaruppskot eisini uppskot til samtyktar.

Framhaldandi 2. viðgerð 14. apríl. § 1 fall við 4-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar fall við 3-0 atkvøðum. Málið sostatt burturdottið.

56 ST-sáttmáli um gíslatøkur.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at ST-sáttmáli um gíslatøku frá 17. december 1978 verður ratifiseraður uttan fyrivarni fyri Føroyar og lýstur at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at ST-sáttmáli um gíslatøku frá 17. december 1979 verður ratificeraður uttan fyrivarni fyri Føroyar.

Ein ratification av sáttmálanum krevur ikki broytingar í galdandi lógarreglum í Føroyum, við tað at tær neyðugu lógarreglurnar fyri at lúka reglurnar í sáttmálanum eru framdar við kgl. fyriskipan nr. 1609 frá 9. september um broytingar í revsilógini (International straffelov).

Við gíslatøku eftir artikkul 1 í sáttmálanum skilst, at ein persónur tekur ein annan persón fanga ella heldur aftur persóni og hóttir við at drepa ella meinsla hann ella halda honum aftur við tí endamáli at tvinga onkran til at gera ella lata vera við at gera okkurt, sum er ein treyt fyri at lata persónin leysan.

Eftir artikkul 2 í sáttmálanum binda statirnir, ið undirskriva sáttmálan, seg til at áseta hóskandi revsireglur fyri gíslatøku, mett út frá tí, at hetta má metast sum eitt sera álvarsligt brotsverk.

Harafturat inniheldur sáttmálin m.a. reglur í artikkul 5, 9, 10 og 11 um sínámillum rættarhjálp millum luttakandi statirnar og eina skyldu til at útflýggja gíslatakaran til ein annan luttakandi stat, ella um útflýgging ikki kann fara fram, so at staturin sjálvur rættarsøkir viðkomandi.

Viðlagt fylgir eintak av sáttmálanum.

Sí skjal 10

1. viðgerð 4. februar. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Eftir áheitan frá ríkisumboðnum legði landsstýri hin 29. januar fyri tingið uppskot til samtyktar um ratifikatión av ST-sáttmála um gíslatøku frá 17. decem-

ber 1978 uttan fyrivarni. Upplýst verður, at ratifikatión av sáttmálanum ikki krevja broytingar í galdandi lógarreglum í Føroyum.

Samhært § 1 í sáttmálanum skilst við gíslatøku, at ein persónur tekur annan persón fanga ella heldur aftur persóni og hóttir við at drepa ella meinsla hann ella halda honum aftur við tí endamáli at noyða onkran til at gera ella lata vera við at gera okkurt, sum er ein treyt fyri at lata persónin leysan.

Ríkini, ið undirskrivað hava sáttmálan, binda seg til at áseta hóskandi revsireglur fyri gíslatøku og meta hana vera álvarsligt brotsverk.

Við 1. viðgerð hin 5. februar varð málið beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin tekur undir við teimum sjónarmiðum, sum liggja til grund fyri uppskotinum og heldur, at eisini Føroyar eiga at taka støðu til tað óhugnaliga, órættvísa og raðuliga, sum ágangur móti og píning av sakleysum menniskjum er — eisini tá ið bólkar halda seg kunna rættvísgera gíslatøku í striðnum fyri einum endamáli, sum sett verður fram um líðingar hjá einstaklingum, sum ikki eru partar í striðnum. Ásannandi, at sovorðin framferð er ímóti føroyskum hugsunnarhátti, og at yvirgangur av hesum slagi eisini onkuntíð kundi rakt sakleysar føroyingar, heldur nevndin tað vera sjálvsagt, at Føroya Løgting tekur undir við sáttmála Sameindu Tjóða um gíslatøku og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mars 1987. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 10-2-17.

57 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1987.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 16. december 1986 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1987.

Viðmerkingar:

Sambært skipanini millum Føroyar og Noreg um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskirættindi dagfest 7. februar 1979 (løgtingsmál nr. 49/1976) skulu partarnir fyri eitt ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar vóru í Keypmannahavn tann 15. og 16. december 1986. Partarnir samdust um viðløgdu skipan.

Fyri veiðuna av vanligum matfiski ber skipanin fyri 1987 í sær,
at føroysk skip á norskum fiskiøki norðanfyri 62° n.br. íroknað »gráa økið« fáa loyvi at veiða 5.400 tons, harav toskur 3.600 tons, hýsa 950 tons og annar fiskur 850 tons (í 1986 tilsamans 4.600 tons, harav ávikavist 3000 tons av toski, 800 tons av hýsu og 800 tons av øðrum). Av »øðrum« (kongafiskur, upsi, svartkalvi) er bert loyvt at veiða 500 tons av hvørjum slagi, og umfatar kvotan eisini hjáveiðuna í øðrum fiskiskapi. Harumframt er semja um, at føroysk skip í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard kunnu veiða 800 tons av toski og 300 tons av øðrum botnfiski (í 1986 ávikavist 500 og 200 tons).

Umframt norsku toskakvotuna í Barentshavinum er avtalað, at 4.200 tons av tí kvotu, ið føroyingar kunnu veiða sambært fiskiveiðisáttmálanum við Sovjetsamveldið, kunnu veiðast í norskum sjógvi (í 1986 4.000 tons).

Sostatt kunnu veiðast tilsamans 10.700 tons av toski og hýsu á norska økinum og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard, mótvegis 9.400 tons í 1986.

Norsk skip fáa í føroyskum sjógvi loyvi at veiða við línum og gørnum 6.000 tons av botnfiski (sama nøgd sum í 1986). Upsaveiðan má ikki fara upp um 1.150 tons (í 1986 sama nøgd). Í loyvdu veiðuni er íroknað hjáveiða upp til 1.200 tons; av hvørjum fiskaslagi má hjáveiðan fyri hvønn túr ikki fara upp um 35 %.

Viðvíkjandi sínámillum fiskiskapi av ídnaðarfiski ber skipanin í sær, at føroysk skip fáa loyvi at veiða 18.000 tons (í 1986 20.000) av hvítingsbróðum, nebbasíld, svartkjafti og brislingi sunnan fyri 62°N. Av hesum 18.000 tonsunum má veiðan av brislingi í mesta lagi verða 2.000 tons (sum í 1986). Kvotan umfatar eisini hjáveiðu av øðrum fiskasløgum, upsi og síld undantikin.

Norðan fyri 62°N er loyvt føroyskum skipum í royndarfiskiskapi at veiða upp til 5.000 tons av svartkjafti (sama nøgd sum í 1986).

Sunnan fyri 62°N er loyvt føroyingum at veiða upp til 1.500 tons av upsa (í 1986 1.700 tons) og 1.800 tons av síld (1.500 tons í 1986).

Vegna ta lágu heildarkvotuna í 1987 fyri makrel í Norðsjónum kundu norskir myndugleikar ikki lata Føroyum nakra makrelkvotu. Henda støðan fer ikki at ávirka spurningin um at lata Føroyum makrelkvotu seinni.

Eftir at Noreg í 1980 setti 200 fjórðinga fiskimark rundan um Jan Mayen, ynsktu føroyingar at fáa kvotur á hesum fiskiøki, ið kundu loyva framhaldandi veiðu har. Sambært avtaluni kunnu føroyingar í 1987 veiða 5.000 tons av svartkjafti við Jan Mayen (sama nøgd sum í 1986).

Vegna støðuna hjá lodnustovnunum í Barentshavinum og við Jan Mayen

kundu norðmenn ikki bjóða nakra kvotu fyri 1987, men søgdu teir seg til reiðar at umhugsa spurningin av nýggjum, um nettokvotu var ásett fyri veiðu í 1987.

Fyri 1987 er avtalað ein sínámillum veiða av makreli innanfyri eina kvotu upp á 7.000 tons til hvønn partin (í 1986 sama skipan).

Norsk skip fáa loyvi at veiða 65.000 tons av svartkjafti (sama nøgd í 1986), 55 skip fáa loyvi at veiða við troli ella nót, (sama skipan í 1986). Av skipunum mugu bert 22 trolskip (20 í 1986) verða á fiskileið isenn, umframt 13 (10 í 1986), ið hava loyvi til at leita eftir svartkjafti uttanfyri eina av vaktar- og bjargingartænastuni til eina og hvørja tíð ásetta høvuðsfiskileið.

Í 1987 verður norska brugduveiðan undir Føroyum 100 tons av livur (sama nøgd í 1986).

Sum í 1986 umfatar sáttmálin við Noreg føroyska rækjuveiðu við Svalbard. Frá norskari síðu var avtalan treytað av, at føroysku myndugleikarnir átóku sær at avmarka føroysku rækjuveiðuna við Svalbard til 11 skip, í meðal kunnu 7 skip fiska í senn (sama skipan í 1986).

Eitt yvirlit yvir tey skip, ið ætla at vera við í sínámillum fiskiskapinum í 1987 skal verða avvarðandi føroysku og norsku myndugleikunum í hendi innan 1. februar 1987.

PROTOKOL FRA DRØFTELSER MELLEM NORSKE OG FÆRØSKE MYNDIGHEDER I KØBENHAVN DEN 13. DECEMBER 1984 OM GENSIDIGE FISKERIRETTIGHEDER I 1985.

Den 12. og 13., december 1984 drøftede en færøsk delegation ledet af kontorchef Johan Djurhuus og en norsk delegation ledet af afdelingsdirektør Arthur Holm, færøske fiskeri i Norges fiskerizoner og norsk fiskeri i færøsk fiskerizone i 1985. Drøftelserne var baseret på aftalen om gensidige fiskerirettigheder undertegnet 7. februar 1979.
De to parters delegationer fremgår af bilag 1.
Parterne blev enige om:

1. Færøsk fiskeri i Noregs fiskerizoner.
A. I den økonomiske zone nord for 62° n.br.

1. 1900 tons torsk.
2. 5.000 tons torsk overført fra den færøske kvote i USSR's fiskerizone.
3. 500 tons kuller (hyse) som bifangst.
4. 1.000 tons andre arter (rødfisk (uer), sej, hellefisk (blåkveite)).
   Det er kun tilladt at tage indtil 500 tons af hver art. Kvoten skal også omfatte bifangster i andre fiskerier.

5. 8.000 tons sommerlodde.
6. 20.000 tons lodde, overført fra færøsk kvote i USSR's fiskerizone, heraf kan indtil 10.000 tons fiskes som vinterlodde.
7. 7.000 tons makrel.
8. Indtil 5.000 tons blåhvilling (kolmule) som forsøgsfiskeri i et nærmere afgrænset område.

Fiskeri af lodde kan ikke finde sted i de områder og de perioder, hvor sådant fiskeri er forbudt for norske fiskere.

Den færøske part vil inden 21. september 1985 orientere den norske part om eventuel uudnyttet loddekvote med henblik på, at en ubenyttet kvote kan fiskes af norske fiskere.

50 % av de enkelte færøske torske- og loddefangstere i det tilstødende område i Barentshavet, som grænser op til Norges og USSR's fastlandskyster, skal afregnes på de af Norge tildelte kvoter.

B. I fiskeværnszonen ved Svalbard.

1. 500 tons torsk.
2. 200 tons andre arter (væsentligst rødfisk (uer) og hellefisk (blåkveite)).

Færøsk loddefiskeri i fiskeværnszonen ved Svalbard skal holdes inden for den under I.A.5 og 6 nævnte kvoter.

De færøske myndigheder påtager sig at begrænse det færøske rejefiskeri i fiskeryærnszonen ved Svalbard til 9 fartøjer, gennemsnitlig 5 fartøjer i fiskeriet samtidig.

Den norske part kan med en uges varsel etablere områder i fiskeværnszonen ved Svalbard, hvor det af hensyn til bevaring af torske- og kulleryngel skal være forbudt at drive rejetrawling.

C I den økonomiske zone syd for 62° n.br.

1. 20.000 tons sperling (øjepål), tobis, blåhvilling (kolmule) og brisling, hvoraf indtil 2.000 tons brisling. Kvoten omfatter også bifangster af andre arter, dog ikke af sej.
2. 1.700 tons sej incl. bifangster i andre fiskerier.
3. Makrel.
   På grund af den særdeles lave totalkvote i 1985 for makrel i Nordsøen, kunne man fra norsk side ikke give Færøerne nogen makrelkvote. Dette vil ikke præjudicere spørgsmålet om en tildeling til Færøerne af en makrelkvote i senere år.
   Dersom tobisfiskeri i henhold til anbefaling fra ACFM af bestandsmæssige hensyn begrænses for norsk fiskeri, skal samme begrænsning også gælde for færøskt fiskeri.

D. I fiskerizonen ved Jan Mayen.

1. 5.000 tons blåhvilling (kolmule).
2. Lodde.
   Dersom Norge fastsætter en nettokvote for norsk fiskeri i 1985, vil man fra norsk side nærmere vurdere spørgsmålet om en eventuel loddekvote til Færøerne. Overfiskeriet i 1981 vil blive lukket fra en eventuel kvote i 1985.

II. Norsk fiskeri i færøsk zone.

1. 7.000 tons bundfisk (lange, brosme, sej, blålange).
   Inden for denne kvote må sejfangsterne ikke overstige 1.150 tons. Kvoten omfatter også bifangst af andre bundfiskearter op til 1.200 tons tilsammen. Heraf må bifangst på en enkelt fangstrejse ikke overstige 35 %.
   Fiskeriet forudsættes drevet med henholdsvis sejgarn og bankline.
2. 15.000 tons makrel.
3. 40.000 tons blåhvilling (kolmule).
   Blåhvillingen kan fiskes med trawl eller not. Antal fartøjer med licens til trawlfiskeri: 50. Antal trawlfartøjer samtidig: 16, desuden 10 på forsøgsfiskeri (fiskeleting) uden for det hovedfelt, som til enhver tid defineres af den færøske fiskerinspektion.
4. 150 tons brugdelever.

III. Licensspørgsmål.

Parterne blev enige om inden 1. februar 1985 at sende hinanden liste over fartøjer, som ønsker at deltage i fiskeriet i den anden parts zone. Det vil være muligt at efteranmelde fartøjer: Fartøjer, som har haft tilladelse til at fiske i hinandens zoner i 1983, kan benytte samme tilladelse indtil videre i 1984.

IV. Andre spørgsmål.

Blåhvilling (kolmule).
Parterne var enige om behovet for fastsættelse af en TAC for denne bestand i lys af videnskabelig rådgivning.

København, den 13. december 1984.

Arthur Holm (sign.)

Johan Djurhuus (sign.)

10. februar bað formaðurin um, at tingmálini 57, 58, 59, 60 og 61 — fiskivinnusáttmálar — vórðu viðgjørdir undir einum. Hetta varð játtað.

Málið var eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina, sum 3. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. januar og eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið.

Samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Pauli Ellefsen hevur tó hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur fult undir við tí, sum framsøgumaður Sambandsfloksins, Jógvan I. Olsen, bar fram undir 1. viðgerð av hesum máli.

Hann segði m.a.: »Í Barentshavinum er tað gleðiliga hent, at toska- og hýsustovnurin hevur ment seg munandi í seinastuni og sambært norska blaðið »Fiskaren« er toskakvotan økt úr 440 til 660 túsund tons eftir einum ári. Hýsukvotan er økt úr 100 til 250 túsund tons. Hetta fiskirikidømið, ið norðmenn og russar eiga, skuldi við einum so stórum vøkstri givið góðar vónir hjá okkum at fingið eina kvotu har.

Tá hugt verður eftir hesi nýggju avtaluni fyri 1987, sæst, at vit hava fingið 1.100 tons av botnfiski og 300 tons av síld meira enn í fjør. Samstundis hava vit mist 200 tons av upsa og 2.000 tons av iðnaðarfiski, meðan norðmenn hava somu nøgd í føroyskum sjógvi sum seinasta ár. Sáttmálin liggur sostatt á sama støði sum í fjør. Men norðmenn hava fingið fríari ræsur at fiska svartkjaft við Føroyar, og ein leggur til merkis, at rækjuloyvini til føroyingar við Svalbard ikki eru økt í mun til avtaluna síðsta ár.

Líkt er til, at norðmenn ætla at steðga føroysku rækjuveiðuni við Svalbard.«

Minnilutin heldur sostatt, at okkara menn hava fingið alt ov lítið burturúr teimum møguleikum, sum júst í ár liggja fyri at økja fiskivinnusamstarvið við norðmenn.

2. viðgerð 5. mars 1987. Uppskotið varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1500-1-11-5.

58 Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1987.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 11. december 1986 millum Føroyar og Sovjettsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1987.

Viðmerkingar:

Samhært skipanini millum Føroya og Sovjettsamveldisins og høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri 1 ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøki hoggja parta.

Samráðingarnar um eina slíka avtalu fyri sínámillum fiskiskap í 1987 vóru í Tórshavn í døgunum 9. til 12. desember 1986 og samdust partarnir um viðløgdu skipan.

Sambært avtaluni fáa føroysk skip loyvi til á búskaparøki Sovjettsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti uttan fyri 12 fjórðingar at veiða 25.500 tons av toski, íroknað hjáveiðu av hýsu og øðrum botnfiski. Av nevndu 25.500 tonsum av toski og hýsu, íroknaða hjáveiðu kunnu 15.000 tons verða veidd í felagsøkinum í Barentshavinum, 5.500 í Eystrasalti og hini 5.000 tonsini av kvotuni kunnu verða veidd í norska partinum av Barentshavinum, treytað av góðkenning norsku myndugleikanna. Sambært løgtingsmál nr. 57/1986: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1987 hava norsku myndugleikarnir góðkent, at fiskað verður 4.200 tons á norskum øki.

Eisini er loyvt føroyskum skipum at veiða 2.500 tons av rækjum á búskaparøki Sovjettsamveldisins í Barentshavinum uttanfyri 12 fjórðingar.

Viðvíkjandi møguleikunum hjá føroyskum skipum at veiða 20.000 tons av lodnu í búskaparøki Sovjettsamveldisins í Barentshavinum skulu nærri samráðingar vera millum partarnar gjøgnum telex.

Afturfyri verður loyvt russiskum skipum at veiða á sjóøki Føroya tilsamans 142.000 tons av svartkjafti til matna í 1987. Aftaná samráðingar millum partarnar yvir telex kunnu føroysku myndugleikarnir loyva at veidd verða upp til 20.000 tons aftrat av svartkjafti.

Frá sovjettiskari síðu verður eingin avmarking ásett fyri talið av føroyskum fiskiforum.

Frá føroyskari síðu verður talið av sovjettiskum fiskiforum í svartkjaltaveiðuni avmarkað til 20 í tíðarskeiðinum 1. apríl til 31. oktober 1987 tav hesum kunnu á økinum ásett í punkti VIII b í avtalumi í tíðarskeiðinum 15. apríl til 31. mai 1987, tó í mesta lagi verða 15 skip og 17 tíðarskeiðinum 1. januar til 31. mars og 1. november til 31. desember 1987 á føroyskum fiskiøki.

Partarnir samdust um at halda fram við sínámillum royndarfiskiskapinum í 1987.

5 sovjettisk skip kunnu fáa loyvi at gera royndarfiskiskap í føroyskum sjógvi, djúpri enn 700 m, 3 kunnu fáa loyvi samstundis. Loyvt verður einum av áðurnevndu 3 skipum at reka djúpvatnsroyndarfiskiskap íroknað dýpið millum 500-700 metrar rundan um Ytra Builey Bunka, tó so at samlaða veiðan av botnfiski hægst verður 200 tons.

Royndarfiskiskapur skal fremjast eftir fiskiætlan, sum partarnir skulu siga hvør øðrum frá frammanundan gjøgnum telex.

Áhugi var fyri nærri visindaligum samstarvi og í hesum sambandi vera við í millumlanda samstarvi um svartkjaft og síld.

Loyvt verður 5 sovjettiskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir makreli og høgguslokki á føroyskum sjóøki á teimum leiðum, har sovjettisk skip hava loyvi at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða veiðan av markreli má ikki fara upp um 5.000 tons og av høgguslokki 2.000 tons.

Sovjettisku myndugleikarnir loyva einum føroyskum skipi at reka royndarfiskiskap eftir hørpuskel (Chlamys islandica) á sovjettiskum fiskiøki, tó soleiðis at veiðan í mesta lagi verður 200 tons.

Fyri allan royndarfiskiskap annars á føroyskum øki er galdandi, at føroyingar kunnu seta sínar serfrøðingar umborð á sovjettisku skipini.

SÍ SKJØLINI *// A-C*

10. februar bað formaðurin um, at tingmálini 57, 58, 59, 60 og 61 — fiskivinnu sáttmálar — vórðu viðgjørdir undir einum. Hetta varð játtað.

Málið varð eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina, sum 3. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. januar og eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Dánjal Pauli Danielsen, Henrik Old, Hergeir Nielsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Pauli Ellefsen) hevur hesar viðmerkingar:

Sáttmálin fyri 1987 liggur á einum haggri stoði enn sáttmálarnir fyri undanfarin ár.

Tað er vælkent, at russar øll árini hava ynskt at hækka um javnvágina í fiskivinnusáttmálunum. Hetta hevur ikki kunnað verið góðtikið frá føroyskari síðu, orsakað av tvørrandi møguleikum fyri at fiska tær kvotur, sum russar hava boðið okkum í Barentshavinum.

Nú er tað gleðiliga hent, at toska- og hýsnustovnarnir í Barentshavinum hava ment seg óført, og tí er rætt at eftirlíka russum í teirra ynski um hækking av javnvágini.

Hin vegin er minnilutin av teirri áskoðan, at okkara sendinevnd átti at fingið betri hýti afturfyri tann stóra vøksturin í svartkjaftakvotuni, sum russar hava fingið tillutað sambært fyriliggjandi sáttmála.

Minnilutin er væl nøgdur við, at okkara sendinevnd hevur gingið ynski Sambandsfloksins á møti um at arbeiða fyri at úlvega okkum møguleikar fyri at royna eftir skeljum í russiskum sjógvi. Hóast talan ikki er um tær stóru nøgdirnar, kann hetta verða ein byrjan til nakað betri og størri.

2. viðgerð 5. mars. Eftir uppskoti frá Adolf V. Hansen stuðlað av Fólkaflokkinum fór atkvøðugreiðsla fram við navnkalli.

Ja atkvøddu:

Anfinn Kallsberg,
Olaf Olsen,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Videro,
Jógvan Sundstein,
Eliesar Arge,
Pauli Ellefsen,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Agnar Nielsen,
Jógvan I. Olsen,
Jóhannes Martin Olsen,
Eilif Samuelsen,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen
Jóannes Dalsgaard,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tummas Arabo,

	Asbjørn Joensen,
	Hilmar Kass,
	Signar Hansen,
	Hergeir Nielsen,
	Heini O. Heinesen,
	Øssur av Steinum,
	Hans Jacob Debes.
Nei atkvøddu:	Adolf V. Hansen,
Burturstaddir:	Óli Breckmann,
	Karin Kjølbro,
	Tordur Niclasen.

Uppskotið samtykt við 28 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu, 3 burturstaddir.

F.L. j. nr. 1500-1-11-2.

59 Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1987.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagf. 18. december 1986, um sínámillum fiskirættindi í 1987 millum Føroyar og EEC.

Viðmerkingar:

1. Tann 21. november 1986 byrjaðu samráðingar millum umboð fyri Føroya landsstýri og EEC-nevndina í Bruxelles um sínámillum fiskirættindi í 1987

millum Føroyar og EEC. Hetta fundarumfar var ørslitaleyst, men samráðingarnar vórðu síðani uppafturtiknar í Bruxelles, og úrslitið av samráðingunum er viðlagda skipan, undirritað í Bruxelles 18. december 1986.

2. Sáttmálin fyri 1987 javnvigar í toskavirði við sáttmálan fyri 1986. EEC hevur síðani 1982 sett sum treyt fyri eini avtalu, at føroyingar ataka seg at avmarka laksaveiðunum, visandi til, at ein munandi partur av ti laksi, ið verður fiskaður við Føroyar stavar frá ánum í EEC-londum.

Partarnir eru í ár av teirri áskoðan, at spurningurin um ásetan av eini laksakvotu eigur at verða loystur innan NASCO, og at partarnir vilja samarbeiða fyri at gera sítt til at røkka endamálið við NASCO-sáttmálanum.

3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1987 av óskøgdum fiski eru hesar:

Hjá EEC-skipum á landleiðini:

Samlaða nøgdin av botnfiski, svartkjafti og makreli verður í 1987:

500	tons av toski og hýsu
2.400	tons av upsa
7.000	tons av kongafiski
3.300	tons av blálongu og longu
1.300	tons av flatfiski (svartkalvi iroknaður)
500	tons av ymiskum fiskasløgum
25.000	tons av svartkjafti
5.000	tons av makreli

Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu í iðnaðarfiskiskapi; í 1986 vóru nøgdirnar tær somu, hjáveiðan ló 750 tons. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu á havleiðunum vestanfyri Skotland (í 1986: 1100 tons).

(b) 6.000 tons av tí vestara makrelstovninum; í 1986 var eisini loyvt at veiða 6.000 tons.

(c) 6.750 tons av rossamakreli, tsama nøgd sum í 1986).

(d) 9.000 tons av hvítingsbróður, 9.000 tons av nebbasild og 2.000 tons av brislingi; 1986-tølini vóru ávikavist 18.000 tons, 10.000 tons og 3.000 tons. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróður (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan) og nebbasild, treytað av, at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 20.000 tons. (í 1986 31.000).

(e) 600 tons av sild vestan fyri Skotland, (í 1986 650 tons).

(f) 60.000 tons av svartkjafti (1986 48.000 tons).

(g) 500 tons av sild í Skagerak; sama nøgd sum í 1986.

(h) 150 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3PS (St. Pierre og Miquelon) (í 1986 var nøgdin tann samal).

Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (smb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EEC og Grønland:

Í 1987 eru kvotur í grønlendskum sjógvi tær somu sum í 1986 nevniliga:

(i) 475 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (í 1986 sama nøgd). 675 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1986 sama nøgd).

(j) 150 tons av svartkalvu undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1986 vóru nøgdirnar tær somu.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønlandi) (í 1986 var nøgdin tann sama).

(l) Loyvt er í 1987 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland (í 1986 sama nøgd).

SÍ SKJØLINI *12 A-11*

10. februar bað formaðurin um, at tingmálini 57, 58, 59, 60 og 61 — fiskivinnusáttmálar — vórðu viðgjørdir undir einum. Hetta varð játtað.

Málið varð eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina, sum 3. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. januar og eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Dánjal Pauli Danielsen, Henrik Old, Hergeir Nielsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Pauli Ellefsen) hevur hesar viðmerkingar:

Skipanin millum Føroya og EEC hevur frá seinast í sjeytiárunum verið nógv umrødd á løgtingi og eisini millum manna.

Fyrsta avtalan frá 1978 lá á einum støði upp á næstan 50 túsund tons í toskavirði.

Tíverri gingu bert 2 til 3 ár inntil støðið kom niður í helvt. Hetta var ein dyggur sneitur fyri føroyska fiskivinnu og fyri føroyska búskapin í heila tikið.

Tað eydnaðist undanfarna landsstýri at halda javnvágina í nøkur ár, men undir sitandi landsstýri er aftur spkuliga farið at dragna.

Tað er ikki lætt at skilja, at Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin gera hesa avtalu við EEC, tá ein hevur í huga, at hesir flokkar í andstøðu ikki kunnu taka undir við sáttmálum fyri undanfarin ár, sum vóru munandi betri fyri Føroyar enn hesin. Hin vegin sæst týiliga, at hetta landsstýrið hevur roynt at liva upp til sama fiskivinnupolitikk, tá talan er um avtalur við onnur lond, sum undanfarna landsstýrið, og tað tekur minnilutin sum eitt positivt tekin.

2. viðgerð 5. mars. Uppskotið samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1198-2-72.

60 Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1987.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NAFO-ársfundinum í september 1986 um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum í 1987.

Viðmerkingar:

Á 7. regluliga ársfundi í NAFO, hildin í Halifax, Kanada, 8. - 12. september 1986 var tilráðingin aftur í ár frá vísundaliga ráðnum, at stovnurin av toski á Flemish Cap framvegis var ov lítil, og mælt varð tí frá at fiska av honum í 1987.

Eins og undanfarin ár kundu tey limalond, ið veiða á økinum, harímillum Føroyar, ikki taka undir við einum toskabanni á hesum øki.

Sett varð tí fram uppskot um at halda fram við somu skipan sum í 1986. Semja var um hetta uppskotið, tó so at EEC tók fyrivarni. Í 1985 mótmæltu Spania, Portugal og EEC eisini og ásettu egnar kvotur, ið tey mettu, samsvaraðu við veiðu teirra har undanfarin ár. EEC hevur aftur í ár mótmælt kvotuásetanini, nú eisini umboðandi Spaniu og Portugal.

Føroyska toskakvotan fyri 1987 á Flemish Cap, NAFO-øki 3 M verður sostatt 2.900 tons eins og í 1986.

Føroyingar veiða eisini árliga nakað av toski á øki 3 NO. Eingin kvota verður her serstakliga tillutað føroyingum, men vit hava seinastu árini veitt av hesi kvotu, tillutað øðrum (»others«).

Toskakvotan til »others« í 3 NO varð í 1987 eins og í 1986 sett til 700 tons.

Vist verður til hjálagda skjal 1.

Skjal I.

SCHEDULE I

Quota Table[1] for 1987

Column I	II	III	IV	V	VI	VII	VIII	IX	X	XI
Contracting Party	Cod	Cod	Redfish	Redfish	American plaice	American plaice	Yellow-tail	Witch	Capelin	Squid (Illex)
	Div. 3M	Div. 3NO	Div. 3M	Div. 3LN	Div. 3M	Div. 3LNO	Div. 3LNO	Div. 3NO	Div. 3NO	Subareas 3–4[4a]
1. Bulgaria	-	-	300	-	-	-	-	-	-	500
2. Canada	100	15,955	500	10,650	150	47,300	14,630	3,000	400	M.S.[6]
3. Cuba	480	-	1,750	2,450	-	-	-	-	250	2,250
4. EEC	2,405	250	1,200	-	-	610	300	-	250	M.S.[6]
5. Faro Islands (Denmark)	2,900	-	-	-	-	-	-	-	-	-
6. GDR	-	-	-	850	-	-	-	-	-	-
7. Iceland	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
8. Japan	-	-	400	-	-	-	-		800	2,250
9. Norway	1,200	-	-	-	-	-	-	-	3,000	
10. Poland	500	-	-	-	-	-	-	-	300	1,000
11. Portugal	3,500	1,315	1,900	-	350	-	-	-	-	500
12. Romania	-	-	-	-	-	-	-	-	-	500
13. Spain	560	10,780	-	-	-	-	-	-	-	2,250
14. USSR	1,270	4,000	13,850	10,900	1,000	-	-	1,950	5,000	5,000
15. Others	50	700	100	150	500	90	70	50	0	-
16. Special Reservation[2]	-	-	-	-	-	-	-	-		-
17. Total Allowable Catch	12,965[5]	33,000	20,000	25,000	2,000	48,000	15,000	5,000	10,000	150,000

[1]Quotas are in metric tons.

[2]There are no Special Reservations for 1987

[4a]The opening date for the squid (Illex) fishery is 1 July

[6]Any quota listed for squid may shall be increased by a transfer from any coastal state as defined in Article 1, para 3 of the NAFO Convention, provided that the TAC for squid is not exceeded. Transfers made to Contracting Parties conducting fisheries for squid in the Regulatory Area shall be reported to the Executive Secretary, and the report shall be made as promptly as possible.

[5]The TAC for Cod in Div. 3M will be increased beyond 12,965 mt until the Scientific Council advises that the spawning biomass has reached a level approximately equal to one-half the average level of unexploited biomass associated with fishing at F0.1 and assuming long term average recruitment levels.

[7]Not specified because the allocations to those Contracting Parties are as yet undetermined, although their sum shall not exceed the difference between the total of allocations to others Contracting Parties and the TAC.

10. februar bað formaðurin um, at tingmálini 57, 58, 59, 60 og 61 — fiskivinnusáttmálar — vórðu viðgjørdir undir einum. Hetta varð játtað.

Málið varð eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina, sum 3. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. januar og eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 28. mars. Uppskotið samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1519-20.

61 Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1987

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir Løgtingið viðløgdu semju dagf. 18. december 1986 um sínámillum fiskirættindi í 1987 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR).

Viðmerkingar:

Heilt síðan at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hevur Týska Demokratiska Lýðveldið biðið um og fingið loyvi til at reka svartkjaftaveiðu í føroyskum sjógvi.

Í 1980 byrjaði føroyskur toskafiskiskapur í Eystrasalti og varð tá sett sum treyt fyri fiskiskapin hjá skipum úr Týska Demokratiska Lýðveldinum undir Føroyum, at føroyingar fingu eina toskakvotu á teirra havøki.

Í 1980 fingu føroyingar eina kvotu uppá 400 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 2.800 tons av svartkjafti undir Føroyum.

Í 1981 fingu føroyingar eina kvotu upp í 800 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 6.600 tons av svartkjafti undir Føroyum. Loyvda skipatalið hjá DDR varð samstundis hækkað úr 2 í 3. Samstundis varð skipatalið hjá føroyingum hækkað úr 3 í 5. Av kvotuni uppá 800 tons av toski kundu 400 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.d. upp í 600 tons av sild.

Í 1982 fingu føroyingar eina kvotu uppá 975 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 8.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av tí hækkaðu kvotuni kundu 500 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 750 tons av sild. Talið av føroyskum skipum varð samstundis hækkað úr 5 í 7.

Í 1983 fingu føroyingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Føroyska skipatalið varð samstundis hækkað úr 7 í 10.

Í 1984, 1985 og 1986 fingu føroyingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Føroyska skipatalið var tó í 1985 hækkað úr 10 í 15 og DDR skipatalið 4 før.

Á fundi í Rostock tann 17. og 18. desember 1986 ímillum umboð fyri Føroya landsstýri og umboð fyri fiskivinnumyndugleikarnar hjá DDR varð funnið fram til hjáløgdu semju um sínámillum fiskiskap millum Føroyar og DDR fyri 1987.

Føroyska toskakvotan verður í 1987 eisini tann sama sum í 1984, 85 og 86 nevniliga 1.300 tons. Av hesi kvotu kunnu 650 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Talið av føroyskum skipum verður óbroytt, 15 før. Av hesum førum hava í mesta lagi 12 loyvi at fiska samstundis á landleiðini hjá DDR.

DDR fær í 1987 loyvi at veiða 10.000 tons av svartkjafti og fyri fyrstu ferð kunnu í staðin fyri 1.000 tons av svartkjafti 1.500 tons av makreli verða veidd av DDR-førum. Óbroytt skipatal.

Partarnir vilja royna at gjøgnumføra notuskifti áðrenn 15. februar 1987.

Í sambond við samráðingarnar um sínámillum fiskiskap fyri 1987 fegnaðust samráðingarnevndirnar um rammusáttmálan, sum varð undirritaður í Tórshavn tann 14. mai 1986.

10. februar bað formaðurin um, at tingmálini 57, 58, 59, 60 og 61 - fiskivinnusáttmálar — vórðu viðgjørdir undir einum. Hetta varð játtað.

Málið varð eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina, sum 3. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. januar og eftir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 5. mars. Uppskotið samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-3.

62 Broyting í løgtingslóg um studning til fiskivinnuna.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi;

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til fiskivinnuna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 31 frá 29. mai 1985 um studning til fiskivinnuna verður í § 1 sett sum nýtt 4. stk.:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til fiskerierhvervet.

§ 1.

I lagtingslov nr. 31 af 29. mai 1985 om støtte til fiskerierhvervet i § 1 tilføjes som nyt stk. 4:

»*4. stk.* 8-mannanevndin hevur umframt fyrisitingina av játtanum sbr. § 1 eftirlit við áseting av avreiðingarprísum á fiski til ídnað.«

§ 2.

Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

»*Stk. 4.* 8-mandsnævnet har forudover administration af bevillingen i henhold til § 1 tilsyn med fastsættelse af indhandlingspriser for fisk til industri

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Løgtingslógin um studning til veiðu av ídnaðarfiski frá 1975 § 4 heimilaði eini 6-mannanevnd til at fylgja við og hava eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísum á fiski til ídnað.

Í 1978 varð henda greinin broytt soleiðis, at sett varð í staðin nevnd til at áseta avreiðingarprísin á ídnaðarfiski.

Orsøkin til broytingarnar í 1978 varð, at landsstýrið ynskti, at skipanin fyri ídnaðarfisk skuldi vera hin sama sum fyri feskfiskin smbr. lógina um ráfiskagrunnin.

Fært hevur verið fram, at tað er ynskiligt, at meiri kapping verður í prísásetingini fyri ídnaðarfisk. M.a. hevur felagið Nótaskip sent landsstýrinum bræv um hetta.

Munur er á møguleikunum hjá virki í Føroyum og t.d. í Danmark, bæði av geografiskum orsøkum, og tí munur er á framleiðslukostnaði. Hetta seinna er viðurkent í tí, at í løtuni verður meiri stundingur latin til ídnaðarfisk, landaður í Føroyum enn niðri. Hóast hetta verður tað hildið vera rætt, at prísásetingin í Føroyum kemur meira at laga seg eftir teimum prísum, sum eru at fáa aðrastaðni, serliga í Danmark, og tí verður skotið upp at avtaka nevndina og leggja eftirlitið við ídnaðarprísunum undir nevndina fyri studningi til fiskivinnuna.

Studningsnevndin kannar longu sum er hesi viðurskifti, tá studningsløvurin hjá ídnaðarskipunum skal metast.

Víst verður til løgtingsmál nr. 63/1986: Avtøka av løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 5. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. januar 1987 og eftir 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at 8-mannanevndin fær umframt fyrisitingina av játtanum studning til fiskivinnuna eisini eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísinum á fiski til ídnað.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Ivan Johannesen, Jógvan I. Olsen og Olaf Olsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men setir eitt uppskot fram.

Minnilutin (Signar Hansen, Tórálvur Mohr Olsen og Øssur av Steinum) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 24. mars 1987. Atkvøðugreiðslan 31. mars. § 1 samtykt við 17-0, § 2 við 17-0. Við 17-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 3. apríl. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1517-2-1. Lóg nr. 62 frá 14. mai 1987.

63 Avtøka av løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 14 frá 5. mai 1975, sum broytt við løgtingslógunum nr. 60 frá 3. september 1975, 39 frá 6. mai 1976, 23 frá 18. mars 1980, 37 frá 20. mai 1981 og 31 frá 29. mai 1985, verður sett úr gildi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om tilskud til fangst av industrifisk.

§ 1.

Lagtingslov nr. 14 af 5. maj 1975, som ændret ved lagtingslovene nr. 60 af 3. september 1975, 39 af 6. maj 1976, 23 af 18. marts 1980 og 31 af 20. maj 1985, ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Løgtingslógin um studning til veiðu av ídnaðarfiski frá 1975 § 4 heimilaði ein 6-mannanevnd til at fylgja við og hava eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísum á fiski til ídnað.

Í 1978 varð henda grein broytt soleiðis, at sett varð í staðin nevnd til at áseta avreiðingarprísin á ídnaðarfiski.

Orsøkin til broytingarnar í 1978 varð, at landstýrið ynskti, at skipanin fyri ídnaðarfisk skuldi vera hin sama sum fyri feskfiskin smbr. lógini um ráfiskagrunnin.

Fært hevur verið fram, at tað er ynskiligt, at meiri kapping verður í prísásetingini fyri ídnaðarfisk. M.a. hevur felagið Nótaskip sent landsstýrinum bræv um hetta.

Munur er á møguleikunum hjá virki í Føroyum og t.d. í Danmark, bæði av geografiskum orsøkum, og tí munur er á framleiðslukostnaði. Hetta seinna er viðurkent í tí, at í løtuni verður meiri studningur latin til ídnaðarfisk, landaður í Føroyum enn niðri. Hóast hetta verður tað hildið vera rætt, at prísásetingin í Føroyum kemur meira at laga seg eftir teimum prísum, sum eru á fáa aðrastað-

ni, serliga í Danmark, og tí verður skotið upp at avtaka nevndina og leggja eftirlitið við ídnaðarprísunum undir nevndina fyri stunding til fiskivinnuna.

Studningsnevndin kannar longu sum er hesi viðurskifti, tá studningstørvurin hjá ídnaðarskipunum skal metast.

Samstundis verður løgtingslóg um studning til fiskivinnuna nr. 31 frá 29. mai 1985 broytt samsvarandi, jvbr. løgtingsmál nr. 62/1986.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 5. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. januar 1987 og eftir 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Í uppskotinum verður mælt til at avtaka ta nevnd, ið ásetir avreiðingarprísin á ídnaðarfiski og í staðin leggja eitt príseftirlit undir nevndina, ið umsitur studningin til fiskivinnuna.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Ivan Johannesen, Jógvan I. Olsen og Olaf Olsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Signar Hansen, Tórálvur Mohr Olsen og Øssur av Steinum) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 24. mars 1987. Atkvøðugreiðsla 31. mars, § 1 varð samtykt við 17-0, § 2 við 17-0 atkvøðum. Við 17-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 3. apríl. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

FL. j.nr. 1501-15-2. Lóg nr. 61 frá 14. mai 1987.

64 Leingjan av flogvøllinum í Vágum.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum

1. at læta gera projekt til leingjan av flogvøllinum í Vágum.
2. at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar um teira luttøku í einum tílíkum projekti.

Viðmerkingar:

Tann 20. februar 1986 setti Sambandsflokkurin fram uppskot fyri løgtingið um at flogvallaviðurskiftini í Føroyum blivu kannað.

Sum er kunnu bert serliga útgjørd flogfør lenda í Vágum. Hetta er ikki nøktandi fyri okkara samfelag.

Endamálið hjá Sambandsflokkinum er at tryggjað, at øll vanliga nýtt flogfør á altjóða rutum skulu vera før fyri at lenda í Føroyum.

Kann flogvøllurin í Vágum í nógv stóran mun byggjast út, so hava vit jú longu tann flogvøll okkum tørvar. Er tað ikki gjørligt at útbyggja hendan flogvøll nóg tryggan og nóg stóran, so má sjálvandi umhugsast hvat so skal gerast.

Nógv hevur verið tosað um at flúgva farm, fyrst og fremst fisk og fiskaúrdráttir og aðrar útflutningsvørur, úr Føroyum og innfluttar vørur til Føroyar. Hetta krevur eisini eina nóg langa lendibreyt.

Málið, sum Sambandsflokkurin setti fram í februar 1986, bleiv viðgjørt í samferðslunevndini tann 7. apríl sama ár. Málið bleiv sent til landsstýrið.

Nú skjótt eitt heilt ár er farið, hava vit einki hoyrt aftur frá hesum týdningarmikla máli. Og einki bendir á, at aðrir enn Sambandsflokkurin hevur áhuga fyri at fáa hendan spurningin loystan.

Tí loyvir undirritaði sær at seta fram hetta uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 4. februar. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av tingmanninum Ivani Johannesen tann 29. januar 1987 og undir 1. viðgerð tann 4. februar beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og hildið fundir við flogvallarleiðslurna og tekniskt kønar.

Nevndin metir seg ikki hava fingið tað tilfar og upplýsingar til ta viðgerð av málinum, ið neyðug er, og eru fundir avtaladir við stovnar, ið kunnu lýsa tað tekniska støðið, ið talan er um.

Nevndin ásannar, at málið er so mikið umfatandi, at tað framhaldandi arbeiðið má gerast í samferðslunevndin sum millumtingsnevnd.

Sostatt setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur samferðslunevndini at halda fram við fyriliggjandi málsviðgerð sum millumtinganevnd og at leggja málið aftur fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni í 1987.

2. viðgerð 9. apríl. Uppskot nevndarinnar fall við 16-0 atkvøðum. Upprunauppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

65 Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1987 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Eisini verða møgulcikar fyri at borga vanligt fyri goymslulánum, bæði fyri rávørur og fyri lidna framleiðslu, til niðursjóðingarvirki og til fiskaroykivirki í Føroyum. Borgan verður givin fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1987 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Også bliver det muligt at garantere simpelt for lagerlån, både for råvarer og for færdigproduktion, til konserveringsvirksomheder og til fiskerygningsvirksomheder på Færøerne. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% av låneværdien.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 5 frá 9. juni 1986, sum fór úr gildi 31. december 1986, sí løgtingsmál nr. 31/1985.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, Løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

Í fíggjarárinum 1986 vórðu hesar borganir veittar:

Tórshavnar Roykivirki	5, 6 mió. kr.
P/f Brekkum	1,04 mió. kr.
Havnsbrún	2 × 10 mió. kr.
P/f í Garðstovu	5, 0 mió. kr.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 10. februar. § 1 varð samtykt við 18-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 18-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. vigerð 18. februar. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1408-5-2. Lóg nr. 11 frá 27. februar 1987.

66 Millumlanda reglur um útinnan av revsing v.m.

Ár 1987, hósdagin 29. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 323 frá 4. juni 1986 »om international fuldbyrdelse af straf m.v.« og Europa-sáttmáli »om overførelse af domfældte« verða lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Lóg nr. 323 frá 4. juni 1986 »om international fuldbyrdelse af straf m.v.« við tilhoyrandi Europa-sáttmála kan eftir § 15 setast í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan við neyðugum broytingum vegna serligu viðurskifti í Føroyum.

Eftir lógini og sáttmálanum kunnu persónar, ið eru dømdir at sita í útlandinum, undir ávísum treytum verða fluttir til teirra heimland at sita.

Fyri at verða heimfluttur krevst, at ein sjálvur ella verjin góðkennir hetta, at dómsvaldið samtykkir, og at danska lógmálaraðið eisini góðkennir heimflytingina.

Fyri at verða fluttur til Danmarkar at sita, skulu eisini fylgjandi treytir verða loknar:

a) Viðkomandi skal hava danskan heimarætt, ella hava fastan bústað í Danmark (Føroyar og Grønland roknað),
b) dómur og revsilongd eru endalig,
c) í mindsta lagi 6 mánaðir eru eftir av revsingini (undantak kann veitast),
d) lógarbrotið, ein er dømdur fyri, eisini skal metast sum lógarbrot í Danmark.

Høvuðsreglan er, at revsingin verður umskipað til ein danskan dóm. Í hesum føri er ikki møguligt at siga frammanundan nakað ítøkiligt um slag ella longd av revsing í Danmark. Upprunaliga revsingin skal umskipast av einum donskum rætti, soleiðis at viðkomandi fær eina revising, sum svarar til hana, viðkomandi hevði fingið, um viðkomandi hevði framt lógarbrotið í Danmark. Eftir reglunum í sáttmálanum kann umskipaða revsingin ikki gerast harðari ella longri enn upprunaliga revsingin, og øll tíðin, viðkomandi hevur sitið í fongsli í dómslandinum, skal dragast frá.

Í summum førum vil dómslandið tó ikki samtykkja í yvirflyting, um so er, at revsingin verður umskipað til ein danskan dóm. Í slíkum førum hevur danski løgmálaráðharrin møguleika at áseta, at yvirflyting kann fara fram eftir reglum um fraunhaldandi revsing sum í dómslandinum.

Landsfútin, sum hevur havt málið til ummælis, hevur úttalað, at lógin og sáttmálin uttan broytingar kunnu setast í gildi í Føroyum.

1. viðgerð 4. februar. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Landsstýrið legði hin 29. januar 1987 fyri tingið uppskot til samtyktar um at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 323 frá 4. juni 1986 um millumtjóða útinning av revsing v.m. og Europa-sáttmála um flyting av dømdum sáttmálapartanna millum. Lógin kann sambært § 15 setast í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan.

Høvuðsinnihaldið í lógini og sáttmálanum er, at persónar, sum eru dømdir at sita í útlondum, kunnu verða fluttir til heimlandið at sita. Treytin er, at hin dømdi sjálvur, verjin, dómsvaldið og fyri Danmarkar viðkomandi danska løgmálaráðið góðkenna heimflytingina.

Høvuðsreglan er, at revsingin, persónur er dømdur uttanríkis, verður umgjørd

til danskan dóm av donskum rætti, soleiðis at revsingin svarar til hana, viðkomandi hevði fingið, varð hann dømdur av donskum rætti fyri sama brot. Í summum førum kann tó dómslandið (t.e. landið har viðkomandi upprunaliga er dømdur) krevja, at revsingin, hóast heimflyting, verður tann sama, sum persónurin er dømur í dómslandinum.

Fútin hevur havt málið til unnmælis og hevur gjørt greitt, at lógin og sáttmálin uttan broyting kunnu setast í gildi í Føroyum.

Við 1. viðgerð hin 5. februar varð málið beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið.

Nevndin heldur, at menniskjansligar grundir tala fyri, at lógin og sáttmálin verða lýst at galda í Føroyum. Hartil er sáttmálin í samsvari við anda Europaráðsins, sum stendur aftan fyri hana. Nevndin leggur dent á, at við tað at eisini føroyingar sum danskir ríkisborgarar eru umfataðir av sáttmálanum og lógini, um tey verða lýst at galda í Føroyum, mælir rættarnevndin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mars 1987. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 501 2 1.

67 Ábøtur á vegastrekkið Kollafjørður/Hósvík

Ár 1987, týsdagin 3. februar legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fyri eitt at skipa fyri, at vegastrekkið Kollafjørður/Hósvík (frá maskinstøðini til Hósvíkar) verður breiðkað soleiðis, at tað kann lúka nútíðar ferðslu- og trygdarkrøv.

Viðmerkingar:

Millum 1974 og 1984, tá fólkaflokkurin hevði samferðslumál sum málsøki, fór fram stór útbygging av føroyska veganetinum. Serliga í Norðstreymoy vóru stór framstig gjørd. Síðan hetta stýrið tók við, eru allar ferðsluútbyggingarnar í sama øki stórt sæð steðgaðar.

Tá tað tó nú loksins sær út til, at landsstýrið fer at seta í verk náttúrligu útbyggingina av vegasambandinum millum Norð- og Suðurstreymoy (tunnilin Oyrarcingir - Kaldbaksbotn), eigur samstundis at verða havt í huga tey vegastrekki, sum í hesum partinum av landinum harðliga hava ábøtur fyri neyðini.

Eitt av hesum strekkjum, frá maskinstøini norðuri í Sundum til Hósvíkar, má metast eitt tað vandamiklasta í landinum, tá hugsað verður um ferðslutættleikan har.

Tá tað samstundis er greitt, at allur ferða- og farmaflutningur í størri og størri mun verður fluttur landvegis, og at hesin flutningur uttan iva fer at økjast munandi, tá tað ætlaða tunnilssambandið millum Oyrareingir og Kaldbaksbotn verður veruleiki, er tað óforsvarligt, at áðurnevndi vegur ikki samstundis verður breiðkaður, so at hann kann lúka nútíðar ferðslukrøv.

Dag og dagliga verða vit mint á, hvussu umráðandi tað er, til tess at verja mannalív móti at verða týnd í ferðsluni, at vegastrekkini í landinum standa mát við galdandi ferðslu og trygdarkrøv.

Tað átti tí at verið náttúrligt, at landsstýrið tók sær ábyrgdina av, at vegapettið millum Kollafjørð og Hósvík verður sett í forsvarligan stand.

1. viðgerð 18. februar. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum tann 3. februar 1987 og undir 1. viðgerð 18. februar s.á. beint í samferðslunevndina.

Málið snýr seg um, at vegastrekkið frá »Landsfjósinum« norðanfyri Kollafjørð og norður til Hósvíkar verður breiðkað.

Nevndin hevur viðgjørt málið og ásannar at nevnda vegastrekki hevur ábøtur fyri neyðini.

Ásannað verður somuleiðis, at onnur høvuðsvegastrekki í landinum í minst líka stóran mun hava ábøtur fyri neyðini til tess at lúka tíðarinnar ferðslu- og trygdarkrøv.

Her verður hugsað um vegastrekkið m. Fjarða og Skipanes.

Umtalaðu ábøtur á nevnda vegastrekki verða mettar til 92 mió. kr., ávikavist 38 mió. kr. og 54 mió. kr.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Asbjørn Joensen, Heini O. Heinesen, Tórolvur M. Olsen og Jóh. M. Olsen) er av tí áskoðan, at ein raðfesting av ábótum á høvuðs-

vegakervið, og í hvønn mun hesar út frá einum ferðslu- og trygdarligum sjónarmiði skulu ráðfestast.

Minnilutin (Sv. Åge Ellefsen og Eyðun Viderø) tekur í fyrsta lagi undir við uppskotinum og í øðrum lagi undir við uppskot meirilutans.

2. viðgerð 27. mars 1987. Atkvøtt varð um málið skuldi aftur í nevnd, men hetta var ikki samtykt við 7-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 19-2 atkvøðum. Uppskotið fall við 9-0 atkvøðum.

68 Viðvíkjandi eykamanning til ferðslupolitiið.

Ár 1987, týsdagin 3. februar legði Olaf Olsen, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at syrgja fyri, at løgreglan fær upp til 5 ferðslupolitistar aftrat, ið skulu sum høvuðsarbeiði hava at vera á vegunum til tess at ansa eftir, at ferðslulógirnar verða hildnar.

Er ikki møguligt at fáa pening til tær útreiðslur, sum standast av hesum, í verandi løgregluskipan, verður landsstýrinum heimilað at taka peningin av eykafíggjarløgtingslóg fyri 1987, og síðani at seta upphæddina á fíggjarløgtingslógina framyvir.

Viðmerkingar:

Ferðslulógirnar eru munandi broyttar íseinastuni - t.d. eru reglurnar fyri, nær ið bilstjóri missir koyrikortið fyri at koyra ov skjótt, munandi skerpaðar - og vil vónaðu øll, at hetta fór at hjálpa upp á ferðslutrygdina, men vit mugu ásanna

bert fáar mánuð aftaná, at hesar lógir komu í gildi, at ferðsluvanlukkurnar aldri hava verið fleiri.

Hetta sýnir bert, at lítið hjálpir at seta lógir í gildi, um tær ikki verða hildnar, og hvat kunnu vit nú gera, fyri at so skal verða.

Eftir at hava verið í samband við sýslumenn og leiðsluna fyri løgregluna halda vit, at um fimm ferðslupolitistar verða settir afturat við tí høvuðsuppgávu at vera á vegunum og hava eftirlit við ferðsluni, so hevði tað verið koyrt munandi hóvligari enn nú. Um hetta kostar 1 millión krónur ella so, eiga vit at taka hesar útreiðslur á okkum, um roknast kann við, at hetta hevði fækkað um ferðsluvanlukkurnar.

1. viðgerð 3. mars. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Fólkaflokkurin legði málið fyri tingið hin 3. februar. Uppskotið miðar ímóti, at landsstýrið skal syrgja fyri, at løgreglan fær upp til 5 ferðslupolitistar afturat. Er hetta ikki fíggjarliga møguligt í verandi løgregluskipan, verður landsstýrinum heimilað at taka peningin av eykafiggjarlóg fyri 1987 og síðan seta upphæddina á fíggjarlógini framyvir.

Við 1. viðgerð 3. mars 1987 varð málið beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið saman við umboðum fyri fútaembætið og politistafelagið, sum serliga eru ímóti, at óútbúgvið fólk verður sett til løgreglurarbeiði.

Nevndin mælir til, at tingmálið verður tikið til viðgerðar í rættarnevndini um millumtinganevnd og setur fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur rættarnevndini at viðgera uppskot um eykamanning til ferðslupolitiið sum millumtinganevnd og at leggja málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskot til samtyktar varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

69 Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og skamtannarskipanini.

Ár 1987, mikudagin 4. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt antin við lógaruppskoti ella í samstarvi við løgregluna at bera so í bandi, at galdandi rúsdrekkalóg og harvið reglugerðir um galdandi skamtannarskipan verða fylgdar.

Viðmerkingar:

Tað hevur leingi ljóðað og er nýliga prógvað, at tað ber til at fáa skattaváttan og skamtanarkort til rúsdrekka uttan at skula leggja fram legitimatión ella fullgilduga fullfrú.

Tað sigst av royndum at vera gjørligt hjá ungdómi niður til 13 ára aldur, tá tey verða skrásett sum A-skattgjaldarar, at innloysa øl upp til gullstyrki. Møguleiki er somuleiðis til staðar við misnýtslu av gestakortum.

Endamálið við galdandi rúsdrekkalóg, antin hon so verður hildin heppin ella ikki, er júst at fyribyrgja, at komandi er til rúsløg hjá hálvvaksnum og stórum smábørnum í óavmarkaðum nøgdum.

Ovurnýtsla av rúsdrekka millum ungfólk er menniskjaligt og samfelagsligt vandamál, sum Føroya Løgting hevur áhyrgd av at steðga í tann mun, tað er gjørligt.

2. viðgerð 26. mars 1987. Atkvøðugreiðslan varð útsett til seinni fund.

Við atkvøðugreiðsluna 31. mars tók Óli Breckmann málið aftur, meðan Adolf V. Hansen tók málið uppaftur.

Við 13-0 atkvøðum fell málið.

70 Bygging av eystaru brimverju v.m. í Kirkjubø.

Ár 1987, hósdagin 5. februar legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at tann eystara brimverjan, sum var partur av plani um ferjulegu í Kirkjubø frá 10. mai 1984 verður bygd. Eisini verður gjørt eitt grótkast frá landi um Árnanes leiðina. Kostnaðurin verður settur á fíggjarløglingslógini 1988.

Viðmerkingar:

Í 1984 varð gjørd ein ætlan um bygging av ferjulegu við Árnanes í Kirkjubø. Hesin planur varð víðkaður nakað í mai 1984, soleiðis at samlaða byggingin skuldi umfata:

1) Ferjulegu
2) Brimgarð í samband við ferjulegu
3) Ein brimgarð eystanfyri móti Hólmanum.

Hesin seinasti brimgarðurin skuldi verja lendið á suðurvesturpartinum í bygdini, herundir serliga fornminnini, múrin og kirkjuna. Men harumframt vildi hesin brimgarður eisini givið vernd til eitt sjóøki millum land og Hólman (Sugguna).

Samlaða projektið var í 1984 ætlað at kosta um leið 27 mió. kr., hvarav eystara brimverjan var mett til smáar 3 mió. kr. Ein nýggj meting í dag (dagf. 12. desember 1986) sigur, at samlaði kostnaðurin verður 32 mió. kr., harav eystara brimverjan kostar 3 mió. kr.

Nú hevur ein politiskur meiriluti samtykt at flyta byggingina av ferjuleguni norðureftir til Gomlu Rætt. Vit halda hetta vera óforsvarligt út frá búskaparligum og fíggjarligum sjónarmiðum, tí kostnaðurin av hesi bygging verður helst meir enn tað dupulta (um leið 70 mió. kr.). Men um framvegis politiskur meiriluti er, og neyðug loyvi verða frá náttúrufriðingarnevndini og bygdarráðnum verður ivaleyst bygt.

Eftir stendur kortini, at fyri at verja lendið undir mest týdningarmiklu fornminnunum í Kirkjubø, er neyðugt við áður nevndu eystaru brimverju.

Upplýsast kann eisini, at jarðfrøðingar meta, at landið søkkur 15-20 cm. í 100 ár.

Um hendan brimverjan og ein styttri út frá Árnanesleiðini verða gjørdar, veitir hetta góða kyrru innanfyri millum bygdina og Hólman. Sjálvt um ferjulegu-projektið frá 1984 ikki verður gjøgnumført, so kann hetta, sum her er í uppskoti, geva bygdafólkinum ymiskar møguleikar, sum ikki eru í dag.

Eystara brimverjan kemur eftir metingum at kosta um leið 3. mió. kr., meðan hin vestara helst ikki kemur upp um 2 mió. kr. Leggjast skal aftur at, at eftir okkara uppfatan eiga báðar brimverjurnar at ganga heilt inni frá landi av. Hetta dýrkar ikki projektið, heldur tvørturímóti.

Sæð frá einum landspolitiskum sjónarmiði telur grundgevinginum um varðveitslu av fornminnunum ógvuliga nógv, og rímuligt er tí, at landskassin rindar ein týðandi part av útreiðslunum til slíka brimverju. Landsstýrið eigur tí at samráðast við Kirkjubøar kommunu um býti av byggikostnaðinum.

Fólkaflokkurin heldur tað hava stóran týdning, at hendan brimverjan verður bygd, og sæð í mun til tann stóra kostnað, sum landsstýrismeirilutin annars ætlar at rinda í samband við ferjulegu-projektið við Gomlu Rætt, so eru hesar umleið 5 mió. kr. ein ógvuliga rímuligur prísur. Fólkflokkurin setir tí fram uppskot til samtyktar um at brimverja verður bygd til verju av Kirkjubølandinum og at fáa Sugguna kyrra.

1. viðgerð 18. februar. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum tann 5. februar 1987 og undir 1. viðgerð tann 18. februar s.á. beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Asbjørn Joensen, Tórolvur M. Olsen, Heini O. Heinesen og Jóh. M. Olsen) tekur til eftirtektar at kommunum stendur í boði árliga at søkja løgtingið um studning til ymisk endamál, sum partvís verða tiggjað úr lendingargrunninum.

Slíkur møguleiki stendur eisini avvarðandi kommunu í boði.

Meirilutin tekur tí ikki undir við uppskotinum og setur einki uppskot fram.

Minnilutin (Sv. Åge Ellefsen og Eyðun Viderø) tekur undir við uppskoti fólkafloksins, og mælir til, at uppskotið verður samtykt.

2. viðgerð 27. mars Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd fall við 4-0 atkvøðum. Uppskotið fall við 5-0 atkvøðum.

71 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

Ár 1987, týsdagin 10. februar legði Juul Jacobsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi: .

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974 og nr. 33 frá 16. apríl 1986, verður gjørd hendan broyting.

Í § 17, 2. stk. verða b) og c) soljóðandi:

»b) 1. september — 1. apríl: Lunda, lomviga og álku.

c) 1. oktober til 1. februar: Skarv.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð og hevur hóast løgtingslóg nr. 33 frá 16. apríl 1986 gildi eftir 1. apríl 1988.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst, som ændret ved lagtingslov nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974 og nr. 33 af 16. april 1986 foretages følgende ændring:

I § 17, stk. 2 affattes b) og c) således:

»b) 1. september — 1. april: Lunde, lomvie og alke.

c) 1. oktober — 1. februar: Skarv.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse og er gældende til trods lagtingslov nr. 33 af 16. april 1986 efter 1. april 1988.

Viðmerkingar:

Gamalt er, at lundapisa sæst á sjónum á ólavsøku, og tá koma tær seinastu út. Iletta er fyri so vítt rætt. Tað er altíð ein stórur partur eftir av sildbera 15. august. Seinasta árið viðraði so væl hesa tíðina, so fuglurín var við landið, har komu bátar inn fyri urðarnar í Nólsoy og róku fuglin saman í flokk og skutu hann niður. Slíkt blóðbað hevur eingin sæð fyrr, og má hetta ikki henda aftur, pisurnar lógu deyðar í rúgvuvís, tí mamman varð dripin ella lamskotin.

Niels á Botni visti nógv um fugl, hann segði fyri mær, at vit fingu oftast vitjan av Hetlandsskarvi um veturin, hetta vísir seg eisini nú, hann er friðaður. Hvat

hesin funglur etur av murti og soiði er ikki smávegis, tí er eingin grund at friða hann, meðan hann er her.

1. viðgerð 18. februar. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Juul Jacobsen, løgtingsmanni, tann 10. februar 1987 og varð eftir 1. viðgerð 18. februar 1987 beint í umhvørvisnevnd løgtingsins. Málið snýr seg um at leingja friðingartíðina fyri lunda og stytta um friðingartíðina fyri skarv. Sambært galdandi lóggávu er støðan í dag soleiðis, at loyvt er at skjóta lunda í tíðarskeiðinum frá 15. august til 1. apríl. Loyvt er at skjóta skarv frá 1. september til 31. oktober. Uppskotsstillarin ætlar í uppskoti sínum at loyva skjóting av lunda frá 1. september til 1. apríl, t.v.s. at leingja friðingartíðina við 14 døgum. Hin vegin er ætlan uppskotsstillarans, at tað skal vera loyvt at skjóta skarv frá 1. september til 1. februar, og hetta merkir so, at friðingartíðin verður stytt tilsvarandi.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er komin til ta niðurstøðu, at tað má haldast at vera skilagott at leingja um friðingartíðina fyri lunda, tí nógv bendir á, at øll pisan ikki er floygd, tá ið loyvt er at skjóta lunda samsvarandi galdandi lóg.

Hin vegin tekur nevndin ikki undir við uppskot Juul Jacobsens um at stytta um friðingartíðina fyri skarv, av tí at tað eru so nógvir spurningar í samband við skarvastovnin, sum enn ikki eru greiddir. Í hesum sambandi ger nevndin vart við, at tørvur er á merking og kanning bæði av skarvastovninum, lundastovninum og øðrum fuglastovnum. Nevndin heitir tí á landsstýrið at útvega sær neyðturviliga játtan, soleiðis at slíkar kanningar kunnu fara fram. Nevndin heldur ikki, at tað er skilagott, at fara at gera stórar broytingar í fuglaveiðilógini, eftirsum tað er nevndini kunnugt, at heilt nýggj fulgaveiðilóg er í umbúna, og at uppskot um tílíka lóg verður lagt fyri tingið til heystar. Nevndin hevur fingið upplýst, at sett er nevnd av sakkønum fólki at gera uppskot til hesa nýggju fuglaveiðilógina.

Sostatt er nevndin sinnað at taka undir við punkti b í uppskotinum frá Juul Jacobsen, men ikki við punktinum c.

Út frá hesum mælir nevndin løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá Juul Jacobsen við hesum broytingum og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

broytingaruppskot

1) Í § 1 gongur punkt c út.

2) Í § 2 ganga út orðini:	2)I § 2 udgår ordene:
»og hevur hóast løgtingslóg nr. 33 frá 16. apríl 1986 gildi eftir 1. april 1988.«	»og er gældende til trods lagtingslov nr. 33 af 16. april 1986 efter 1. april 1988.«

3) § 3 í løgtingslóg nr. 33 frá 16. apríl 1986 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. verður strikað.	3) § 3 i lagtingslov nr. 33 af 16. april 1986 om ændring af lagtingslov om fuglefangst m.v. ophævos.

Út frá hesum setir ein samd nevnd fram fylgjandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta hóskandi upphædd til ymsar fuglakanning ar á fíggjarlógaruppskotið fyri 1988.

2. viðgerð 10. apríl. § 1 c fall við 9-0 atkvøðum, uppskot til samtyktar samtykt við 21-0 atkvøðum. Broytingaruppskot 1 fall við 14-0 atkvøðum, § 1 í lógaruppskotinum broytt samtykt við 23-0 atkvøðum. Broytingaruppskot 2 samtykt við 22-0 atkvøðum, § 2 soleiðis broytt samtykt við 22-0 atkvøðum.

Pkt. § 3 í løgtingslóg nr. 33 frá 16. apríl 1986 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. verður strikað, samtykt við 23-0 atkvøðum. Við 28-0 atkvøðum samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. apríl. Málið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 81 frá 14. august 1987.

72 Avtøka av Vinnulánsgrunni Føroya Løgtings.

Ár 1987, hósdagin 5. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

I Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at Vinnulánsgrunnur Føroya Løgtings verður avlikin og at ognir grunnsins fara í grunnin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, smbr. § 7 í viðtøkunum fyri Vinnulánsgrunnin frá 18. november 1941.

II Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging.

§ 1.

Í § 3, stk. 6, í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging verða orðini »Frá 1. januar 1945 er høvuðsdeildin skyldug at lata til Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings« broytt til: »Frá 1. januar 1987 er høvuðsdeildin skyldug at lata til Grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om forsikringsvirksomhed

§ 1.

I § 3, stk. 6, i lagtingslov nr. 24 af 28. marts 1956 om forsikringsvirksomhed ændres ordene »Fra 1. januar 1945 at regne pålægges der hovedafdelingen en årlig afgift til Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings« til: »Fra 1. januar 1987 at regne pålægges der hovedafdelingen en særlig afgift til Grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Vinnulánsgrunnur Føroya Løtings, ið varð stovnaður sambært tingssamtykt frá 14. november 1940, og sum veitti lán til bátar og skip undir og aftaná kriggið.

sæst ikki eftir fyriliggjandi skjølum og roknskapum at hava havt nakað virksemi seinastu 20 - 25 árini.

Lánini, sum grunnurin í síni tíð veitti, eru øll afturgoldin ella avskrivað, og tey lán, sum grunnurin skyldaði, eru øll afturgoldin. Ogn grunsins er pr. 1. januar 1987 kr. 3.109.687, ið er innistandandi í landskassanum.

Eftir løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 § 3, stk. 6, um trygging hevur Tryggingarsambandið Føroyar skyldu til at rinda Vinnulánsgrunni Føroya Løgtings árligt avgjald, svarandi til tann beinleiðis skatt, deildin skuldi latið til landskassa og kommunu tað árið, eftir ti til eina og hvørja tíð galdandi skattalóggávu.

Eftir § 7 í viðtøkunum fyri Vinnulánsgrunnin frá 18. november 1941 skal spurningurin leggjast fyri tingið um avtøku av grunninum at taka støðu til, hvat gerast skal við ognir grunsins.

Annars sæst av landskassans roknskapum, at Tryggingarsambandið Føroyar seinastu 12 árini ikki hevur havt vinning at lata skatt av til Vinnulánsgrunnin við undantak av inntøkuárinum 1984, tá goldnar vórðu 1.831.335 kr. í skatti til grunnin.

Landsstýrið hevur vísandi til frammanfyristandandi samtykt at skjóta upp at avtaka Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings og at ognir hansara fara til Grunnin til endurnýgging fiskiskipaflotans. Í sama grunn fara eisini avgjaldið frá Tryggingarsambandinum Føroyar nú og framvegis.

Hjálagt fylgir eintak av samtyktunum fyri Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings.

1. viðgerð 13. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndini, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 5. mars 1987 og undir fyrstu viðgerð tann 13. mars sama ár beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen og Anfinn Kallsberg) førir fram:

Nú uppskot fyriliggur um at avtaka Vinnulánsgrunnin og at peningurin fer í grunn til endurnýggjan av skipaflotanum, er minnilutin av tí fatan, at rættari er at nýta henda pening til grunn til projektútvikling innan fiskivinnuna. Í grunninum eru kr. 3.109.687,-, so hetta verður ikki tann stóri grunnurin, men kann vera góður at stuðla monnum og virkjum, ið arbeiða við projektútvikling.

Samsvarandi hesum setir nevndi minniluti fram soljóðandi:

I Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at Vinnulánsgrunnur Føroya Løgtings verður avtikin og at ognir grunnsins fara í grunn til projektútvikling.

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður gjørd henda broyting:

Í staðin fyri orðini »Frá 1. januar 1987 er høvuðsdeildin skyldug at lata til Grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum« verður sett: »Frá 1. januar 1987 er høvuðsdeildin skyldug at lata til grunn til projektútvikling«.

§ 1 ændres således:

Formuleringen »Fra 1. januar 1987 pålægges der hovedafdelingen en særlig afgift til Grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum« ændres til: »Fra 1. januar 1987 at regne pålægges der hovedafdelingen en særlig afgift til »Grunn til projektútvikling«.

2. viðgerð 10. apríl 1987. Broytingaruppskot til § 1 fall við 12-0 atkvøðum, § 1 í uppskoti II samtykt við 17-0 atkvøðum, § 2 samtykt við 17-0. Við 17-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð. Uppskot I samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. apríl. Atkvøðugreiðsla 13. apríl. Lógin endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1407-8. Lóg nr. 48 frá 5. mai 1987.

73 Eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan.

Ár 1987, hósdagin 5. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað, tá ið pant er selt við tvingsilssølu, og landskassin ikki hevur fingið fulnað og ikki er útlit til, at skuldarin er førur at rinda skuldina aftur alla ella ein part av henni, at eftirgeva restskuldina alla ella part av henni.

2. stk. Landsstýrinum er heimilað, at landskassin eftir øllum at døma ikki við tvingsilssølu av pantinum fær fulnað, og umstøðurnar annars tala fyri, at gera avtalu um rindan av skuldini, eisini at eftirgeva hana alla ella part av henni, uttan at farið verður undir tvingsilssølu.

3. stk. Landsstýrinum er heimilað í førum, har pant ikki er fyri skuldini, og skuldarin eftir øllum at døma ikki er førur at rinda hana aftur, og umstøðurnar annars tala fyri at gera avtalu um rindan av skuldini, eisini at eftirgeva hana alla ella part av henni.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, sum hon er kunngjørd.

lagtingslov om eftergivelse af eller betalingsordning for gæld til landskassen

§ 1. Landsstyret bemyndiges til, når et pant er afhændet ved tvangsauktion, og landskassen ikke er blevet dækket, og der ikke er udsigt til, at debitor er i stand til at dække gælden i sin helhed eller en del af denne, at eftergive restgælden helt eller delvis.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til, såfremt det er overvejende sandsynligt, at landskassen ikke ved tvangsauktion af pantet får dækning og omstændighederne iøvrigt taler derfor, at træffe en ordning om betaling af gælden, herunder at eftergive denne helt eller delvis, uden at gå til tvangsauktion.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til i de tilfælde, hvor der ikke er pant for gælden, og hvor det er overvejende sandsynligt, at debitor ikke er i stand til at betale denne tilbage, og omstændighederne iøvrigt taler derfor, at træffe en ordning om betaling af gælden, herunder at eftergive denne helt eller delvis.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Tann spurningurin hevur verið fruman, um landsstýrið hevur heimild til, møguliga saman við fíggjarnevndini, at eftirgeva alt ella partar av krøvum, landskassin hevur í samband við veiting av eitt nú studulslánum, studningslánum, kreppulánum, serlánum og øðrum lántum og krøv í samband við vedhaldsútlegg. Onnur dømi enn hesi eru, har landskassin er kreditor eisini óbeinleiðis eitt nú fyri lán veitt úr grunninum undir landsstýrinum, Húsalánsgrunnurin, Menningargrunnurin o.s.fr.

Er eigarin av tí ognini, sum er sett í veð, sum trygd fyri láni, farin á húsagang ella felagið er avtikið, verður tann parturin av kravi landskassans, sum ikki fæst úr búnum, og skuldarin er eitt partafelag ella eingin ábyrgist persónliga, avskrivaður. Í øllum øðrum førum er skuldari, ið persónliga stendur fyri skuldini, og her fæst ikki sama ásannan av, at eingi er at heinta. Úrslitið er tá, at skuldarin framvegis stendur fyri skuldini, um eingin heimild er til at avskriva alt ella t.d. gera avtalu við skuldaran um t.d., at hann rindar ein part, sum hann er mentur til, og tað, ið eftir er, verður eftirgivið.

Ein slík avtala er ikki bert ein hjálp til skuldaran, sum ikki skal verða verandi undir eini skuldarbyrði, hann ikki hevur møguleikar fyri at lyfta, men eisini ein fyrimunur hjá landskassanum, sum tá hevur ein møguleika at fáa nakað.

Um løgtingið viðtekur ta broytingina í konkurslógini um endurskipan (saneringsordning) í skiftirættinum, er har eisini ein útvegur hjá skuldara at fáa skil á skuldini.

Spurningurin, ið her er umrøddur, stendur serliga í samband við, at landsstýrið hevur fingið fyribilsjáttan at seta fólk at innkrevja tær mongu eftirstøður av landskassalánum o.ø.

1. viðgerð 13. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 5. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 13. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tórður Niclasen og Signar Hansen) er av teirri áskoðan at uppskotna heimildin til landsstýrið sambært lógina eigur at vera skipað soleiðis at tað verða landsstýrið saman við fíggjarnevndini, ið fáa heimildirnar sambært fyriliggjandi lógaruppskot. Nevndi meiriluti setir sostatt fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1. stk. 1, 2 og 3 verður orðingin: »Landsstýrinum er heimilað« broytt til: »Landsstýrinum saman við fíggjarnevndini er heimilað«.

I § 1, stk. 1, 2 og 3 ændres formuleringen: »Landsstyret bemyndiges« til: »Landsstyret sammen med finansudvalget bemyndiges«.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen og Anfinn Kalsberg) førir fram: Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður vist til konkurslógina sum nú er samtykt í løgtinginum, at her er ein møguleiki hjá helst komandi skuldara, at fáa skil á skuldini í samband við skiftirættin.

Tá partafeløg ella har eingin heftir persónliga fyri skuld landskassans, verða avskrivað, so heldur nevndi minniluti tað vera rætt, at ein, sum persónliga heftir fyri skuld til landskassan, má hava ein møguleika at sleppa burturúr hesi skuld, í tann mun hann er mentur til við eini hóskandi gjaldsskipan yvir eitt ávíst tíðarskeið, ella at fáa skuldina heilt eftirgivna, um umstøðurnar talað fyri tí.

Tað vísir seg aloftast, at minnilutin ongan møguleika hevur at gera seg galdandi, tá talan er um broytingar til eitt uppskot frá landsstýrinum.

Tað kom fram undir fyrstu viðgerð av hesum uppskotinum, at tað var ikki hildið at vera rætt, at landsstýrið einsamalt hevði avgerðina í hesum máli, men at fíggjarnevndin varð við at viðgera hvørt málið sær, og at ein kvalifiseraður meiriluti í fíggjarnevndini var aftanfyri hvørja avgerð sær.

Tí setir nevndi minniluti (Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen og Anfinn Kallsberg) fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot frá landsstýrinum

Í § 1 stk. 1, 2 og 3 verður orðingin: »Landsstýrinum er heimilað« broytt til: »Landsstýrinum er heimilað saman við einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevndini«.

I § 1, stk. 1, 2 og 3 ændres formuleringen: »Landsstyret bemyndiges til« til: »Landsstyret sammen med et kvalificeret flertal i finansudvalget bemyndiges til«.

10. apríl løgdu Anfinn Kallsberg, Flemming Mikkelsen og Ivan Johannesen fram soljóðandi:

broytingaruppskot

Í § 1. stk. 1 2 og 3 verður orðingin: »Landsstýrinum saman við fíggjarnevndini er heimilað« broytt til: »Landsstýrinum er heimilað saman við einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevndini«.

I § 1, stk. 1, 2 og 3 ændres formuleringen: »Landsstyret sammen med finansudvalget bemyndiges« til: »Landsstyret sammen med et kvalificeret flertal af finansudvalget bemyndiges«.

Viðmerking:

Við kvalifiseraðan meiriluta skilst, at í minsta lagi 5/7 av nevndarlimunum atkvøða fyri.

2. viðgerð 10. apríl. Atkvøðugreiðslan 10. apríl. Broytingaruppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum. § 1 í upprunauppskotinum soleiðis broytt samtykt við 28-0 atkvøðum. Við 28-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. apríl. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 455-2. Lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987.

74 Útbygging av Sands havn.

Ár 1987, mikudagin 18. februar legdi Eydun Videro, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um útbygging av Sands havn.

§ 1. Úr landskassanum verður veitt studningur til útbyggingar av havnarlagnum á Sandi, soleiðis at studningurin verður til støddar 75% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 75 % av kr. 42.000.000 (jbr. § 3) og rindaður við einsstórum ársgjøldum í 6 fylgjandi ár frá og við 1987 at rokna.

§ 2. Ársgjaldið fyri 1987 verður at seta á eykafiggjarlógina fyri 1987, meðan fylgjandi ársgjøld verða at seta á fíggjarløgtingslógina í 5 ár frá og við fíggjarárinum 1988.

§ 3. Tann parturin av játtanini, sum ikki er arbeitt fyri, tá ið fíggjarár er komið at enda, verður við uppískoytisjáttan á fíggjarløgtingslógini fyri fylgjandi ár javnaður samsvarandi broytingum í indeksinum fyri havnabyggingar, sum gjørt er til útrokningar av føroysku tjóðarroknskapunum við føstum prísum sum grundarlag.

§ 4. Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett í sambandi við góðkenning av byggiætlan, eru loknar.

lagtingslov om udbygning af Sands havn.

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnen på Sandur, således at tilskudet andrager 75 % af anlægsudgifterne, dog højst 75 % af kr. 42.000.000 (jfr. § 3) og udredes med lige store årsrater i 6 følgende år fra og med 1987 at regne.

§ 2. Årsraten for 1987 påføres tillægsfinansloven for 1987, medens de følgende årsrater påføres finanslagtingsloven i 5 år fra og med finansåret 1988.

§ 3. Den del af bevillingen, hvilket der ikke er præsteret arbejde ved finansårets slutning, reguleres ved tillægsbevilling for det følgende år i overensstemmelse med indekset for havnebygning, der er udarbejdet til fastprisberegning af de færøske nationalregnskab.

§ 4. Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, førend samtlige betingelser, landsstyret måtte stille i forbindelse med en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt.

§ 5. Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommunan má taka í samband við fremjing av útbyggingini samboert hesi løgtingslóg.

§ 6. Hendan lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 5. Landsstyret bemyndiges til at garantere for de lån, kommunerne måtte optage i forbindelse med udbygningerne i henhold til denne lagtingslov.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í hesum døgum fara fram og eru í umbúna stórar og kostnaðarmiklar útbyggingar av okkara samfelag vinnuliga, samferðsluliga og á annan hátt.

Hendan útbygging krevur stóra fíggjarliga orku, og tá tað er avmarkað, hvussu nógv fíggjarorka landsins kann bera, so verður neyðugt at prioritera, soleiðis at ávísar útbyggingar verða framdar, meðan aðrar mugu bíða.

Ein av peningakrevjandi íløgunum, nevniliga hanabyggingarnar, hava nú í eina tíð verið útsettar, og hevur hetta verið grundað við tí, at íløguvirksemið í landinum er so stórt, at ein komandi havnaætlan má útsetast.

Tað er einki at ivast í, at orsøkin til, at landsstýrið heldur seg kunna útseta eina havnaætlan, er, at flestu havnir eru so mikið útbygdar, at tað ikki darvar tí virksemi, ið er treytað av hesum havnum, um stoðgað verður á eina tíð.
Omanfyri nevndu grundgevingar kunnu kortini ikki nýtast um virksemið í Sandoynni, tí fyrst er at nevna, at ongar av hesum stóru peningakrevjandi íløgunum verða framdar í oynni, men er so at siga alt virksemi tengt at fiskivinnuni, tv.s. tí fiski, ið verður førdur til lands og virkaður á flakavirkjunum. Hetta virksemi treytar inntøku hjá bæði skipum, manningum og tí stóru fjøld, ið fær dagligu úrkomu í samband við flakavirkini.

Soleiðis sum Sandoyggin er dánað, og sum mynstrið er í løtuni, so má roknast við, at Skopun verður fiskihavn og samferðsluhavn, meðan á Sandi verður fiskihavn og harafturat eru her møguleikar fyri at gera størri havn, sum royndir vísa, og verður henda havn høvuðshavnin fyri út- og innflutningi við størri skipum. Eisini hevur henda havn, tá hon er útbygd, møguleikan og plássa at goyma øll skip í oynni, tá serliga ringt vetrarveður ger seg galdandi.

Núverandi havn varð liðugt bygd í 1975, meðan betri og størri verjugarður við grótkasti er gjørdur seinni. Henda havn er kortini í dag alt ov lítil til tey skip, ið nú verða nýtt, og til tey skip, ið eru í umbúna.

Farmaskip, sum koma við farmi, ella koma eftir fiskaúrdrátti úr oynni, mugu sum er leggja at verjugarðinum uttan fyri havnina, men hetta er ótolandi umstøður, tí tað hendir í heilum, at hesir túrar mugu avlýsast, tí ikki er atkomandi, tá hesin verjugarður liggur út ímóti so at siga opnum havi. Tá ætlaða havn verður bygd, koma hesi farmaskip heilt inn í havnina, og kunnu tá sigla higar í øllum vanligum líkindum.

Fyri at fáa havnaviðurskiftini í eina trygga legu er eisini neyðugt at útbyggja Skálavík, og frá politiskari síðu er hetta viðurkent, við tað at peningur er játtaður til at royndarkoyra eitt havnaprojekt, og vil henda útbygging bæði menna bygdina og samstundis tryggja ferðsluna og gera møguleika fyri sambinding við ferðasambandið Tórshavn/Suðuroy. Á teimum herjandi vesturættunum er so at siga altíð kyrt eystanfyri.

Í Skopun verður í løtuni arbeitt við at dýpa og víðka Pollin, og vil hetta tá betra um møguleikarnar bæði hjá fiskiskipunum og strandferðsluni.

Í hesum viðmerkingum er nomið við øll havnaprojektini í Sandoynni, og kemur hetta av, at tað er neyðugt at viðgera og siggja hesar havnaútbyggingar sum eina heild, tá Sandoyggin er soleiðis skapað frá náttúrunnar hond, at allastaðni liggur havnin ímóti so at siga opnum havi.

Løgmaður boðaði frá á ólavsøku, at ein komandi havnaætlan var útsett enn eitt ár, men við fyriliggjandi uppskoti verður heitt á Føroya løgting um at viðgera okkara truplu havnaumstøður nú, tí Sandoyggin er í eini serstøðu, hvat havnum viðvíkur.

Havnarprojektið á Sandi er royndarkoyrt á Danmarks Hydraulisk Institut, og vísa royndirnar eitt gott úrslit.

Ein partur av hesum havnarprojekti er í gerð, við tað at dýpt er uttanfyri ytru innsigling, og í summar verður forhavnin dýpt, og eru játtaðar kr. 12.000.000 til hendan partin.

Ein havnarjáttan kemur at ganga yvir nøkur ár, men tað er greitt, at tá talan er um so stórar upphæddir, so er kommunan ikki før fyri at byrja arbeiðið, fyrr enn ein partur av játtanini er fallin til gjaldingar, og tí má játtanin samtykkjast av løgtinginum skjótast.

1. viðgerð 4. mars. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 75: Skálavíkar havn, og vórðu bæði beind í samferðslunevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. februar 1987 og undir 1. viðgerð tann 4. mars s.á. beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Ashjørn Joensen, Heini O. Heinesen og Tórelvur M. Olsen) tekur til eftirtektar, at útbygging av Sands havn er við á komandi havnaætlan.

Sostatt tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum, og setir heldur einki uppskot fram.

Minnilutin (Jóh. M. Olsen) ivast í, um løgtingsmálini nr. 74 og 75 eru nøkur loysn so sum tey fyriliggjandi, fyri Sand og Skálavík.

Haraftuŕmóti er minnilutin av teirri áskoðan, at bæði málini náttúrligt hoyra undir eina havnaætlan.

Viðvíkjandi Skálavík kravdi Sambandsflokkurin í 1983 at gjørt var eitt projekt yvir havnabyggingina har, og er hettar gjørt og royndarkoyrt á D. H. T. við rímuligum góðum úrsliti.

Í álitinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 1987 hevði Sambandsflokkurin uppskot um at áleggja landsstýrinum at koma við eini 6 ára havnaætlan, harvið kundi m.a. Sand og Skálavík fingið sínar havnatrupulleikar loystar og loyvir minnilutin sær tí einaferð enn at koma við soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skunda undir og koma við eingari nýggjari havnaætlan skjótast gjørligt.

Minnilutin (Sv. Ågc Ellefsen og Eyðun Viderø) førir fram:

Í uppskotinum frá fólkaflokkinum verður millum annað sagt í viðmerkingunum:

»Løgmaður boðaði frá á Ólavsøku, at ein komandi havnaætlan var útsett enn eitt ár, men vit fyriliggjandi uppskoti verður heitt á Føroya Løgting um at viðgera okkara truplu havnaumstøður nú, tí Sandoyggin er í einari serstøðu, hvat havanaumstøðum viðvíkur«.

Tá málið var til 1. viðgerð í løgtinginum kom týðuliga til sjóndar og sum eisini varð endurgivið í útvarpinum, at allir flokkar við undantak av fólkaflokkinum hildu, at Sandoyggin ikki var í nakrari serstøðu, og tí mátti Sandoyggin bíða eftir einari nýggjari havnaætlan eins og aðrar havnir, og hetta hóast sama dag var samrøða við manning av fiskiskipi á Sandi, ið máttu ríma v bygdini við fiskalast, sum ætlanin var at avreiða til flakavirkið, tí ikki var verandi í havnini á Sandi vegna júst ávístu ringu havnaumstøður.

Eftir sum øll tekin eru um, at løgtingið ikki er sinnað at samtykkja fyriliggjandi uppskot, loyva undirritaðu sær at seta fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum í seinasta lagi í Ólavsøkutingsetuni 1987 at leggja fyri løgtingið eina heildarhavnaætlan fyri alt landið.

Annars mælir sami minniluti til, at uppskot fólkaflokksins verða samtykt.

2. viðgerð 27. mars. Uppskotini til samtyktar í álitinum fullu við 12-0 atkvøðum. § 1 í lógaruppskotinum fall við 8-0 atkvøðum. Málið sostatt burturdottið.

75 Útbygging av Skálavíkar havn.

Ár 1987, mikudagin 18. februar legði Eyðun Videro, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um útbygging av Skálavíkar havn.

§ 1. Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggingar av havnarlagnum í Skálavík, soleiðis at studningurin verður til støddar 75 % av byggipeninginum, tó í mesta lagi 75% av kr. 36.000.000 (jbr. § 3) og rindaður við eins stórum ársgjøldum í 6 fylgjandi ár frá og við 1987 at rokna.

§ 2. Ársgjaldið fyri 1987 verður at seta á eykafíggjarlógina fyri 1987, meðan fylgjandi ársgjøld verða at seta á fíggjarløgtingslógina í 5 ár frá og við fíggjarárinum 1988.

lagtingslov om udbygning af Skálavíkar havn.

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til udbygning av havnen på Skálavík, således at tilskudet andrager 75 % af anlægsudgifterne, dog højst 75 % af kr. 36.000.000 (jfr. § 3) og udredes med lige store årsrater i 6 følgende år fra og med 1987 at regne.

§ 2. Årsraten for 1987 påføres tillægsfinansloven for 1987, medens de følgende årsrater påføres finanslagtingsloven i 5 år fra og med finansåret 1988.

§ 3. Tann partur av játtanini, sum ikki er arbeitt fyri, tá ið fíggjarár er komið at enda, verður við uppískoytisjáttan á fíggjarløgtingslógini fyri fylgjandi ár javnaðar samsvarandi broytingum í indeksinum fyri havnabyggingar, sum gjørt er til útrokningar av føroyskum tjóðarrokuskapunum við føstum prísum sum grundarlag.

§ 3. Den del af bevillingen, hvilket der ikke er præsteret arbejde ved finansårets slutning, regsluler ved tillægsbevilling for det følgende år i overensstemmelse med indekset for havnebygning, der er udarbejdet til fastprisberegning af det færøske nationalregnskab.

§ 4. Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett í samband við góðkenning av byggiætlan, eru loknar.

§ 4. Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, førend samtlige betingelser, landsstyret måtte stille i forbindelse med en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt.

§ 5. Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommununa má taka í samband við fremjing av útbyggingini sambært hesi løgtingslóg.

§ 5. Landsstyret bemyndiges til at garantere for de lån, kommunerne måtte optage i forbindelse med udbygningerne i henhold til denne lagtingslov.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sum øllum kunnugt eru havnaumstøðurnar í Sandoynni alt annað enn góðar, og hóast royndir eru gjørdar og framhaldandi útbyggingar av verandi havnum eru í umbúna, so er veruleikin tann, at oyggin frá náttúrunnar hond er soleiðis vorðin, at ongastaðni eru umstøður at fáa eina tílíka havn, ið er komandi til í øllum líkindum, og er tað serliga vesturættirnar, ið skapa trupulleikar.

Við at útbyggja Skálavík verða skaptir møguleikar fyri at tryggja skipaferðsluna, og her verður serliga hugsað um ta vinnuligu, í so at siga øllum veðri til oynna.

Skálavíkar bygdarráð hevur leingi arbeitt við at koma við í eini ætlan fyri størri havnir, men hevur hetta enn ikki eydnast, og hevur millum annað verið ført fram, at tað ikki hevur verið greitt, hvussu henda útbyggingin skal vera fyri at náa endamálini við kyrru í øllum vanligum líkindum.

Fyri at fáa hetta greitt hevur løgtingið áður játtað stuðning 3/4 av kr. 500.000,- fyri at gera nærri kanningar og fyri umleið einum ári síðani varð tí eitt model av ætlaðu havnini royndarkoyrt á DHI í Danmark. Hesar royndir vístu, at til bar at fáa eina væl nýtiliga havn við at inniloka víkina við tveimum verjugørðum av gróti.

Út frá hesum royndum hevur bygdarráðið í Skálavík vent sær til politisku

myndugleikarnar fyri at koma við í einari komandi havnaætlna, men tá henda ikki er komin fram enn, so verður við hesum serstøk lóg um útbygging av Skálavíkar havn løgd fyri løgtingið.

1. viðgerð 4. mars. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 74: Sands havn og vórðu bæði beind í samferðslunevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum 18. februar 1987 og undir fyrstu viðgerð tann 4. mars sama ár beint í samferðslunevndina. Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Tórður Niclasen, Asbjørn Joensen, Heini O. Heinesen og Tórolvur Mohr Olsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setur heldur einki uppskot fram. Meirilutin vísir annars til viðmerkingar sínar í álitinum í løgtingsmáli nr. 74/1986: Útbygging av Sands Havn.

Minnilutin (Jóhs. M. Olsen) vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 74/1986: Útbygging av Sands havn, har minnilutin setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skunda undir og koma við einari nýggjari havnaætlan skjótast gjørligt.

Minnilutin (Sv. Åge Ellefsen og Eyðun Viderø) førir fram:

Í uppskotinum frá fólkaflokkinum verður millum annað sagt í viðmerkingunum:

»Løgmaður boðaði frá á Ólavsøku, at ein komandi havnaætlan var útsett enn eitt ár, men við fyriliggjandi uppskoti verður heitt á Føroya Løgting um at viðgera okkara truplu havnaumstøður nú, tí Sandoyggin er í einari serstøðu, hvat havnaumstøðum viðvíkur«.

Tá málið var til 1. viðgerð í løgtinginum kom týðuliga til sjóndar og sum eisini varð endurgivið í útvarpinum, at allir flokkar við undantak av fólkaflokkinum hildu, at Sandoyggin ikki var í nakrari serstøðu, og tí máltti Sandoyggin bíða eftir eingari nýggjari havnaætlan eins og aðrar havnir, og hetta hóast sama dag var samrøða við manning av fiskiskipi á Sandi, ið máttu rýma av bygdini við fiskalast, sum ætlanin var at avreiða til flakavirkið, tí ikki var verandi í havnini á Sandi vegna júst ávísu ringu havnaumstøður.

Eftir sum øll tekin eru um, at løgtingið ikki er sinnað at samtykkja fyriliggj

andi uppskot loyva undirritaðu at sær at seta fram soljóðandi:

Uppskot


til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum í seinasta lagi í ólavsøkutingsetuni 1987 at leggja fram fyri løgtingið eina heildar havnaætlan fyri alt landið.

Annars mælir sami minniluti til, at uppskot fólkaflokksins verða samtykt.

2. viðgerð 27. mars. Uppskotini til samtyktar í álitinum fullu við ávikavíst 12-0 og 11-0 atkvøðum. § 1 í lógaruppskotinum fall við 9-0, Uppskotið sostatt burturdottið.



5494

Skálavík Havn

Udformning: P,Q,R

oktober 1985.

76 Heimildir og skyldur landsstýrisins at keypa ognir við landskassaveðhaldi

Ár 1987, mikudagin 18. februar legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av ognum við landskassaveðhaldi.

§ 1. Landsstýrinum verður álagt at keypa tær ognir, sum landskassaveðhald er í, tá hesar verða seldar í tvungnari sølu, um ikki boð er, sum tryggjar landskassanum veðhaldsupphæddina.
2. stk. Eru veðhaldsskyldur landskassans, íroknað rentur v.m., minni enn 5 % av uppruna virðinum av ognini, er keypið treytað av góðkenning figgjarnevndarinnar.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað saman við figgjarnevndini landskassans vegna at taka upp neyðug lán at fremja skyldurnar sambært § 1 í hesi lóg.

§ 3. Ognir, keyptar eftir hesi lóg, skulu seljast føroyskum keyparum, tá útlit eru til, at raksturin av viðkomandi ogn kann bera seg.
2. stk. Til ein søla eftir 1. stk. kann fara fram, verður landsstýrinum heimilað at útleiga viðkomandi ogn fyri tíðarskeið, ið ikki mugu vera longur enn eitt ár.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

lagtingslov om køb af ejendomme med landskassegaranti.

§ 1. Det pålægges landsstyret at købe de ejendomme, der har landskassegaranti, når disse sælges ved tvunget salg, der ikke sikrer landskassens garantibeløb.
Stk. 2. Såfremt landskassens garantiforpligtelser medregnet renter m.v. er mindre end 5 % af ejendommens oprindelige værdi, er købet betinget af finansudvalgets godkendelse.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne at optage de lån, der er nødvendige til gennemførelse af forpligtelserne i henhold § 1 i denne lov.

§ 3. Ejendomme købt i henhold til denne lov skal sælges til færøske købere, når der er udsigt til, at driften af vedkommendi ejendom kan betale sig.
Stk. 2. Indtil et salg i henhold til stk. 1 kan gennemføres, er landsstyret bemyndiget til at udleje ejendommen for en periode, der ikke er længere end et år.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Tað er vorðið alt meir og meir vanligt, at landskassin veðheldur, tá vinnutól skulu útvegast. Hóast so er, hava vit ongan miðvísan politikk á hesum øki. Tað at landskassin veðheldur fyri einum vinnutóli, má metast sum ein viðurkenning av, at viðkomandi vinnutól er neyðugt í okkara samfelag. Harumframt eigur eitt landskassaveðhald at verða ein fráboðan um, at landsins myndugleikar meta raksturin undir vanligum umstøðum at kunna hvíla í sær sjálvum. Hvørki landsstýrið, fíggjarnevndin ella eigarar eru harrar yvir konjunkturinum. Men hóast eigararnir ikki eru førir fyri at reka vinnutólið í eina tíð við lágkonjunkturi, so vil ella kann vinnutólið so væl klára allar sínar skyldur og meira til, sum yvir eitt 10-15 ára tíðarskeið.

Tað, at eigararnir eru ikki gjaldførir (eru insolventir), eigur undir ongum umstøðum at føra við sær, at vinnutólið fer á útlendskar hendur fyri ein prís, sum ger nýggju útlendsku eigararnar, serstakliga tá talan er um farmaskip, betur førar fyri at vinna á okkum í kapping (at útkonkurera okkum).

Vinnutól, farin av landinum, hava ongan møguleika beinleiðis ella óbeinleiðis at skaffa samfelagnum effektiv veðhald aftur. Verða vinnutólini haraftrimóti verandi í landinum og fáa lagaligar treytir at verða tikin undir, kann roknast við, at samfelagsliga er javnvág í eftir nøkrum árum.

Tað, ið fer av knóranum, eru ofta nýggir vinnuhættir, og eiga vit tí ikki at gloyma, at møgulig fyribils tap landskassans eiga at vera roknað sum gjald at fáa kunnleika til nýggja vinnuháttin.

Tað, at landsins myndugleikar sleppa endanum og lata onnur samfeløg nýta langtíðarfyrimunirnar, ger, at tílíkar vinnur hava leingi um at koma fyri seg, m.a. orsakað av at fólk missir mótið.

Landskassaveðhald eru komin fyri at verða, og er tí neyðugt at fáa ein reinlinjaðan politikk, um hvat gerast skal, tá vinnutól við veðhaldi ikki eru gjaldfør longur ella tey verða seld undir tvangi.

Hetta uppskotið er ein roynd at gróðurseta ein føroyskan politikk á tí øki, sum er, og verður ein konsekvensur av teimum nú obligatorisku landskassaveðhaldunum.

1. viðgerð 4. mars. Málið varð beint í líggjarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Framsóknarflokkinum tann 18. februar 1987 og undir fyrstu viðgerð 4. mars sama ár beint í fíggjarnevndina.

Uppskot Framsóknarfloksins er viðgjørt í fíggjarnevndini, og tekur ein samd nevnd ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 31. mars. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðum.

77 Keyp av rognum.

Ár 1987, mikudagur 18. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av rognum.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa fyri upp til 8,5 mió. kr. í rognum, og at selja hesi til góðskingarvirki í Føroyum.
2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at selja hesi rogn av landinum, fæst ikki sáttmáli við góðskingarvirki í Føroyum.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað at taka upp neyðug lán í hesum sambandi, herundir einsini til rakstrarútreiðslur í tilknýti til keypið sbrt. § 1, goymslukostnað og til søluvirksemi.

§ 3. Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi tann 1. juni 1987.

lagtingslov om køb af rogn.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe for op til 8,5 mio. kr. rogn, og at sælge disse til forædlingsvirksomheder på Færøerne.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at sælge disse rogn ud af sælge disse rogn ud af landet, om ikke kontrakt fås med forædlingsvirksomhed på Færøerne.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til at optage nødvendige lån i denne forbindelse, herunder også til driftsudgifter i tilknytning til købet i medfør af § 1, lageromkostninger og til salgsvirksomheder.

§ 3. Lagtingsloven får gyldighed dagen efter dens kundgørelse og træder ud af kraft den 1. juni 1987.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 73/1985: Keyp av rognum. Løgtingslóg nr. 37 um keyp av rognum frá 10. apríl 1986 var bert galdandi til 1. juni 1986.

Tá lógin varð lýst 10. apríl 1986 vóru bert 150 tons av rognum tøk í øllum landinum. Hetta varð hildið at vera alt ov lítil nøgd sunnbært sølumenninar hjá P/f Kovanum, Amanda Konserves í Kerteminde. Tá var so mikið útlíðið, at rognatíðin var úti. Sostatt kundi einki gerast í 1986, tá størstiparturin av rognum var seldur av landinum. P/f Kovin fer í likvidatión fyrst í mars mánaða 1986 og fer sølan av virkinum fram í november 1986, tá Menningargrunnurin keypir Kovan.

Í sama mánaða keypir P/f 28/11-1986 í Sandavági Kovan frá Menningargrunninum fyri 8,4 mió. kr. Ætlanin er sum fyrr at nýta virkið fyrst og framst sum niðursjóðingarvirki av rognum. Tað er tí umráðandi at hetta nýggja partafelagið fær fatur á teim rognum, sum í dag eru á goymslu, og somuleiðis tey sum koma á land restina av rognatíðini.

Virkið hevur higartil í ár keypt 60 tons av rognum.

Higartil er ikki gjørdur nakar endaligur sáttmáli um sølu av liðugtvøru. Samhand er við fleiri keyparar og verður mett, at ongir trupulleikar eru um at gera góðan sáttmála um sølu. Hetta sjálvsagt treytað av at nóg mikið av rognum fæst.

Í meðan mælir landsstýrið til, at landskassin fær heimild til at keypa tey rogn, ið eru á goymslu í Føroyum í løtuni, og somuleiðis tey, sum koma á land restina av rognatíðini.

Hesi rogn verða at selja til stigtakararnar, sum ætla at fara undir aftur rognframleiðslu. Verður av eini hvørji orsøk ikki farið undir rognaframleiðslu, selir landsstýrið rognini av landinum sum rá rogn.

1. viðgerð 18. februar. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð á seinni fundi sama dag. § 1 samtykt við 23-0, §§ 2 og 3 samtyktar við 23-0. Við 23-1 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Lógin endaliga samtykt við 23-1 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1427-1-167-2. Lóg nr. 12 frá 27. februar 1987.

78 Broyting í løgtingslóg um menningargrunn (nevndarval).

Ár 1987, mikudagin 18. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn (nevndarval).

§ 1.

§ 3 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 við seinni broytingum um menningargrunn fyri iðnað, handverk og tænastufyritøkur verður soljóðandi:

»Nevnd grunsins telur 5 limir og varalimir.

2. stk. Tríggir limir og varalimir verða valdir av løgtinginum fyri 3 ár. Ein nevndarlimur gongur út á hvørjum ári. Hesir nevndarlimir skulu hava hollan kunnleika til iðnað.

3. stk. Landsstýrið velur tveir limir og tveir varalimir fyri 2 ár. Annar skal vera løgfrøðingur, hin rakstrarbúskaparfrøðingur. Ein av hesum nevndarlimunum gongur út á hvørjum ári, fyrstu ferð við lutakasti.

§ 2.

Løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udviklingsfond (udvalgsvalg).

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973 med senere ændringer om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder affattes § 3 således:

»Fondens bestyrelse består af 5 medlemmer og suppleanter.

Stk. 2. Tre medlemmer og suppleanter vælges af lagtinget for 3 år. Et bestyrelsesmedlem afgår hvert år. De af lagtinget valgte bestyrelsesmedlemmer skal have godt kendskab til industri.

Stk. 3. To medlemmer og suppleanter vælges af landsstyret for 2 år. Den ene skal vær jurist og den anden skal være driftsøkonom. En af disse bestyrelsesmedlemmer afgår hvert år, første gang ved lodtrækning.

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur samtykt at skjóta upp fyri tinginum at broyta lógina um Menningargrunnin, soleiðis at reglurnar um nevndarval verða øðrvísi enn higartil.

Sum er telur nevndin fyri Menningargrunnin tríggjar limir, ið verða valdir av

løgtinginum fyri trý ár, soleiðis at ein nevndarlimur gongur út á hvørjum ári.

Eftir hjálagda uppskoti verður talið av nevndarlimum økt úr trimum upp í fimm. Teir báðir, ið ávikavíst skulu hava løgfrøðiliga og rakstrarbúskaparfrøðiliga útbúgving, verða sambært uppskotinum valdir av landsstýrinum fyri tvey ár í senn.

Viðgerðin av umsóknum, ið koma til grunnin, seta støtri og støtri krøv um góðan kunnleika til búskap og løgfrøði, umframt góðan og hollan kunnleika til ídnað. Fyrisitingin hjá grunninum hevur neyðugan búskaparligan kunnleika og kann, um tað gerst neyðugt, søkja sær løgfrøðiligan kunnleika. Sostatt kundu allar kanningar og rakstrarmetingar verið gjørdar av fyrisitingini.

Hinvegin kunnu trupulleikar taka seg upp undir sjálvari viðgerðini í nevndini. Í slíkum førum vil tað vera ein fyrimunur, at ein búskaparfrøðingur og ein løgfrøðingur eru fastir limir í nevndini. Eftir galdandi lóg skulu verandi nevndarlimirnir hava góðan kunnleika til ídnað, men einki verður sagt um, at hesir skulu hava ávísa útbúgving. Tað verður heldur ikki hildið neyðugt.

Virksemi grunsins er so nógv økt hesi seinastu árini, at tað er ein støtri trygd hjá verandi nevnd og fyrisiting at hava serkøna hjálp beinleiðis í endaligu viðgerðini av teim ymisku umsóknunum.

1. viðgerð 4. mars. Málið var beint í ídnaðarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landstýrinum tann 18. februar 1987 og undir 1. viðgerð tann 4. mars 1987 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hildið fund við stýrið fyri Menningargrunnin.

Ein meiriluti (Heini O. Heinesen, Sverre Midjord, Henrik Old og Olaf Olsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at § 3 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 við seinni broytingum verður óbroytt og setir sostatt einki uppskot fram.

Nevndi meiriluti er av teirri áskoðan, at spurningurin um talið av nevndarlimum eigur at verða endurskoðaður, tá komandi lógin um Menningarstovu hevur verið í gildi eina tíð, soleiðis at tað ber til at síggja, hvussu nevnda lóg ávirkar virksemið og nevndartáttin hjá Menningargrunninum.

Minniluti (Eilif Samuelsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at allir 5 nevndarlimirnir verða valdir av løgtinginum fyri 3 ár. Sostatt setir nevndi minniluti fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til uppskot landsstýrisins:

§ 3 í løgtingslóg nr. 37 frá 25. juni 1973 verður orðað soleiðis: »Nevnd grunsins telur 5 limir og 5 tiltakslimir, sum verða valdir av løgtinginum fyri 3 ár. Ein nevndarlimur gongur út fyrsta árið, tveir tað næsta árið og tveir tað triðja árið við lutakasti. Nevndarlimirnir og tiltakslimirnir skulu hava góðan kunnleika til ídnað«.

§ 3 i lagtingslov nr. 37 af 25. juni 1973 affattes således: »Fondets bestyrelse består af 5 medlemmer samt 5 suppleanter som vælges af lagtinget for 3 år. Et bestyrelsesmedlem afgår det første år, to det næste år og to det tredie år ved lodtrækning. Bestyrelsesmedlemmerne og suppleanterne skal have godt kendskab til industrie.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskot landsstýrisins fall við 3-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá minnilutanum í ídnaðarnevndini fall við 9-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1212-14-1.

79 Føroyskt mótmæli móti bygging av verki til endurútvinnan av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi.

Ár 1987, týsdag 3. mars legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir, at løgmaður og løgtingsformaðurin fara til London at mótmæla bygging av verksmiðju til endurútvinning av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Scotlandi. Ferðin verður skipað í samstarvi við danska uttanríkismálaráðið.

Viðmerkingar:

Bretland ætlar, í samstarvi við Belgien, Frankaríki, Hollandi, Italiu og Vesturtýskalandi, at byggja eina verksmiðju, sum skal endurútvinna plutonium burturúr útbrendum reaktorbrennievni.

Ráevnið til hesa framleiðslu skal fáast frá kjarnorkuverkum í ymiskum londum í Europa.

Hetta merkir, at nógv tons av vandamiklum evnum skulu flytast til og frá verksmiðjuni í Dounreay. Hesin flutningur er hildin at vera vandamikil í sjálvum sær, og hendir vanlukka í hesum sambandi, kann skaðin gerast ovurstórur.

Herumframt er stórur vandi fyri, at verksmiðjan, í sambandi við framleiðsluna, kemur at sleppa vandamiklum avfalli út í náttúruna. Verksmiðjan kemur at liggja bert 350 km. frá Føroyum.

Verður ætlanin um hesa verksmiðju veruleiki, kunnu vit lættliga koma út fyri álvarsamari dálking av okkara egna umhvørvi, dálking sum verður til beinleiðis skaða fyri bæði menniskju, djór og plantur.

Undir øllum umstøðum fer ein tílík verksmiðja at gera stóran skaða á okkara umdømi sum ein framleiðari av reinum fiskaúrdráttum.

Flestu av okkum trúðu, at Føroya Landsstýri tók hendan spurning í álvara. Rætt er tað, at landsstýrið hevur sent donsku myndugleikunum eitt skriv. Men alt týðir uppá, at danir ikki hava fingið ta fatan, at álvara lá aftanfyri. Og okkara myndugleikar sýnast ikki at hava fylgt spurninginum upp. Hóast upplýsingar frá donskum myndugleikum um, at málið var steðgað, so sýnist landsstýrið ikki at hava gjørt vart við seg í hesum álvarsama spurningi. Hetta átala vit harðliga.

Frá fjølmiðlunum hava vit frætt, at ein landsstýrismaður á privatari ferð í Noregi, av norðmonnum bleiv mintur á spurningin, og framvegis sum privatmaður fór í ferðalag við nøkrum norðmonnum til London at mótmæla. Hetta má sigast at vera verri enn einki.

Atburður landsstýrisins kundi bert føra til, at danir og bretar halda áðurnevnda skrivið vera sent uppá kvamsvis.

Fyri at gera bæði donskum og bretskum myndugleikum púra greitt, at vit føroyingar ikki kunnu góðtaka at fáa eina verksmiðju, sum framleiðir brennievni

til kjarnorkuendamál, og sum ivaleyst sleppur vandaniklum evnum út í náttúr una, beint uttan fyri dyrnar, verður sett fram hetta uppskot til samtyktar.

1.viðgerð 13. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 3. mars 1987 og varð eftir 1. viðgerð 13. mars 1987 beint í umhvørvisnevndina. Uppskotið snýr seg um at áleggja løgmanni og løgtingsformanninum at fara til London at mótmæla bygging av verksmiðju til endurvinning av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi. Eisini gongur uppskotið út uppá, at ferðin skal samskipast við danska uttanríkismálaráðið.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er hon samd um, at talan er um eitt mál, ið eigur at verða tikið í største álvarsemi. Nevndin er tó ikki samd um at senda løgmann og løgtingsformannin til Londons at mótmæla.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Øssur av Steinum, Hans J. Debess og Eliesar Arge) tekur til eftirtektar, at landsstýrið hevur mótmælt hjá bretsku stjórnini og vísir í hesum sambandi til svar frá bretsku stjórnini dagfest 24. mars 1987 til løgmann, hjálagt sum skjal.

Av svarinum frá bretska forsætisráðharranum skilst, at øll loyvi enn ikki eru klár, og at endalig avgerð tí enn ikki er tikin, hvørt nevnda kjarnorkuverk skal byggjast í Dounreay ella ikki.

Hin vegin gevur svarið onga trygd fyri, at endurvinningar- og royndarkjarnorkuverkið í Dounreay ikki verður bygt.

Í svarinum vissar bretski forsætisráðharrin løgmann um, at tey strangastu trygdarkrøv verða sett til bretsk kjarnorkuverk, og um at somu krøv sjálvsagt fara at verða sett til eitt møguligt kjarnorkuverk í Dounreay.

Hetta heldur nevndin ikki vera nóg góða trygd móti møguligum vanlukkum og/ella óhappum í framtíðini. Í hesum sambandi vísir nevndin til tey mongu tíðindi í fjølmiðlunum um smærri og størri óhapp og ósketni á bretskum kjarnorkuverkum. Víst verður í hesum samanhangi til ta umfatandi geislavirknu dálkingina av írska havinum, sum stavar frá bretskum kjarnorkuverkum, - verkum, ið verða rikin eftir teimum trygdarkrøvum, sum bretski forsætisráðharrin umtalar í brævi sínum til løgmann.

Annars er nevndin samd um, at allir myndugleikar eiga at fylgja væl við tí, sum hendir í Dounreay, og setir tí uppskot fram til samtyktar samsvarandi hesum.

Nevndin heldur eisini, at tað má vera beint, at Føroya løgting framhaldandi fylgir við gongdini í Dounreay og verður tí mælt til, at umhvørvisnevndin heldur fram sum millumtinganevnd til tess at arbeiða við øllum hesum spurningingum.

Út frá hesum setir ein samd nevnd fram fylgjandi:

I uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fylgja gjølla við í gongdini viðvíkjandi ætlanunum at byggja kjarnorkuverk til endurvinnan av kjarnorkubrennievni í Dounreay og støðugt boða avvarðandi donskum og bretskum myndugleikum frá støðu Føroya til nevndu ætlanir.

II uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at umhvørvisnevndin sum milliuntinganevnd saman við landsstýrinum arbeiðir víðari við Dounreay-málinum við tí fyri eyga at leggja álit fyri løgtingið við frágreiðing um Dounreayætlanina í ólavsøkutingsetuni.

Ein minniluti (Jóannes Martin Olsen) tekur undir við uppskoti Sambandsfloksins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

2. viðgerð 9. apríl. Uppskotið I og II bæði samtykt við 25-0. Uppskot Sambandsfloksins fall við 6-0.

80 Um loyvi til Tórshavnar kommunu til útbygging á Sundi.

Ár 1987, týsdagin 24. mars legði Eilif Samuelsen, løgtingsmaður, vegna Paula Ellefsen og seg sjálvan fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at geva Tórshavnar Kommunu neyðug loyvir til at fremja ta av kommununi ætlaðu útbygging inni á Sundi.

Viðmerkingar:

Tað, sum serliga hevur eydkent sitandi landsstýri og samgongu, heilt frá byrjanini av, er ein sera negativ innstilling mótvegis øllum tí, sum viðvíkur Tórshavn og Suðurstreymi annars.

Henda negativa innstilling er komin og kemur til sjóndar bæði á sjúkrahúsøkinum, á almenna umsitingarøkinum, á vinnuøkinum, eins og á øllum øðrum økjum.

Vit báðir uppskotsstillararnir eru samdir í, at tað er rætt at flyta partar av umsitingini út á bygdirnar. Eitt upplagt dømi um eitt tílíkt hóskandi arbeiðsøki er fyrijutænastan. Onnur dømir kundu verið nevnd.

Eingin ivi er um, at ein áhaldandi politiskur ágangur frá einari samdari samgongu, og frá einum parti av andstøðuni, mótvegis Suðurstreymi, kemur at darva útviklinginum í økinum, til skaða fyri bæði øll tey sum her búgva og fyri landið alt.

Eitt tiltak, framt av sitandi samgongu, sum kemur at fáa álvarsligar negativar avleiðingar, serliga fyri Suðurstreym, er nýggja blokkstuðulskipanin. Komandi reella minking í statsstuðulinum kemur jú fyrst og fremst at raka hetta økið.

I Suðurstreymi eru fá framleiðsluvirkir, og fá produktiv útflutningsskapandi arbeiðspláss í mun til fólkatalið. Hendan skeivleika ætlar kommunan at rætta uppá við útbyggingini á Sundi.

Her umframt leggja uppskotsstillararnir serligan dent á, at útbyggingarnar á Sundi ikki bert koma Suðurstreymi til fyrimunar, men at serliga Norður-

streymoy og Eysturoyggin, seinni eisini Vágoyggin, koma at fáa fyrimun av hesum framleiðslu- og útflutningsskapandi arbeiðsplássum.

Ein høvuðsfyrimunurin við okkara nýmótans vega- og samferðslukervi er júst hann, at tað nú er gjørligt at koma til og frá arbeiði millum nærliggjandi pláss í Føroyum. Tað er ikki longur neyðugt at flyta bústað, um fólk á meginøkinum ynskja at arbeiða á øðrum plássi enn tey búgva.

I dag er tað ikki óvanligt, at føroyingar á morgni og móti kvøldi møta hvørjum øðrum, bæði á Oyggjarvegnum og umborð á rutubátum á veg til arbeiðis. Fólk úr suðurstreymi fara út um, meðan fólk av bygd koma til Havnar ella út á Argir at arbeiða. Hetta er viðvirkandi til at geva okkum ein liðiligan og effektivan arbeiðsmarknað.

Út frá hesum viðmerkingum loyva uppskotsstillararnir sær at seta fram hetta.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av tingmonnunum Paula Ellefsen og Eilif Samuelsen tann 24. mars 1987 og tann 26. í sama mánaða beint í ídnaðarnevndina.

Idnaðarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Sverre Midjord og Henrik Old) tekur ikki undir við uppskotinum frá sambandstingmonnunum, tí sagt verður í viðmerkingunum, at útbyggingarnar á Sundi ikki bert koma Suðurstreymoy til fyrimuns, men at serliga Norðurstreymoy, Eysturoy og seinni Vágarnar koma at fáa fyrimun av hesi útbygging á Sundi.

Undir 1. viðgerð kom greitt fram, at sambandsflokkurin gongur inn fyri at savna virksemið á nøkrum fáum plássum.

Hetta kann meirilutin ikki taka undir við og kann tí ikki taka undir við uppskotinum í tí líki, tað er framkomið í.

Nevndi meiriluti viðmerkir, at landsstýrið má viðgera hetta mál út frá landsplanleggingarætlanum og út frá landsbúskaparligum sjónarmiðum.

Minnilutin (Olaf Olsen) átalar, at landsstýrið ikki avgreiðir kommunal mál eftir reglunum í kommunulógini og býarskipanarlógini. Tað er ikki landsstýrið, sum skal avgera, hvør ið fær byggiloyvi, men kommunali myndugleikin. Landsstýrið skal góðkenna ella sýta góðkenning av einum uppskoti um býarplan ella broyting av býarplani, tá ið hesin hevur ligið alment frammi. Minnilutin setir tí fram hetta:

uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at avgreiða málið frá Tórshavnar kommunu um broyting av býarplani á Sundi eftir galdandi lóg.

Minnilutin (Eilif Samuelsen) mælir til at samtykkja framlagda uppskotið.

2. viðgerð 14. apríl 1987. Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd fall við 9-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá Olafi Olsen fall við 5-0 atkvøðum. Uppskot uppskotsstillarans til samtykar fall við 2-0 atkvøðum.

81 Løgtingslóg um endurgjald til fólkapensjónistar.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Eilif Samuelsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um endurgjald til fólkapensiónsistar:	*lagtingslov om refusion til folkepensionister:*
§ 1.	*§ 1.*
Tann upphædd, sum fólkapensionistur missir í pensiónini orsakað av arbeiðsinntøku, verður goldin honum av landskassanum.	Det beløb, som folkepensionister mister i pensionen som følge af arbejdsindtægt, refunderes af landskassen.

§ 2.

Hendan skipan verður umsitin av Almannastovuni eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

§ 2.

Denne ordning administreres af Almannastovan efter regler, der fastsættes af landsstyret.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Undir verandi skipan er tann reglan galdandi, at um ein fólkapensiónistur hevur eina munandi arbeiðsinntøku afturat, so missir hann burtur av pensiónini.

Um ein stakur fólkapensiónistur hevur eina árliga arbeiðsinntøku, sum er meira enn kr. 32.500, so fellur øll pensiónsviðbótin uppá kr. 567 pr. mánað burtur.

Um eini hjún tilsamans hava eina árliga arbeiðsinntøku uppá meira enn kr. 49.700, so fellur øll teirra pensiónsviðbót uppá kr. 887 pr. mánað burtur.

Hesi viðurskifti hava ført við sær, at nógvir fólkapensiónistar hava kent á sær, at tað loysir seg illa at arbeiða, tá teir umframt at rinda vanligan inntøkuskatt, sum er nóg tungur at bera, eisini skulu missa burtur av pensiónini.

Sambandsflokkurin hevur framvegis ta hugsan, at øll tey, sum halda seg orka, eiga at fáa møguleika fyri at arbeiða, eisini tey gomlu. At arbeiða man vera ein tann besta heilsubótin, og tey flestu ynskja at sleppa at halda fram at arbeiða, sjálvt um tey eru komin upp til pensiónsaldur.

Kostnaðurin av hesi skipan er í fyrsta lagi mettur at vera kr. 900.000,- pr. mánað. Hin vegin er eingin ivi um, at skipanin fer at føra við sær, at fleiri fólkapensiónistar fara at arbeiða meira enn tey gera undir verandi skipan. Eitt dømi er egningin, sum er torfør at fáa avgreidda sum er. Økti aktiviteturin fer at geva landskassanum, umframt kommununum, meiriinntøkur sum minka um nevndu útreiðslur uppá 900 tkr. um mánaðin.

Sambandsflokkurin hevur altíð virkað fyri at bøta um livikorini hjá okkara fólkapensiónistur, og er hetta uppskotið ein liður í hesum politikki floksins.

1. viðgerð 13. mars. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt hin 3. mars 1987 av sambandsflokkinum.

Mælt verður til, at tann upphædd, sum ein pensiónistur missir í fólkapensión vegna lønarinntøku, verður endurgoldin úr landskassanum.

Almanna- og heilsunevndin er varug við, at landsstýrið júst arbeiðir við hesum

spurningi í løtuni, og meirilutin, samgonguflokkarnir, javnaðarflokkurin, tjóðveldisflokkurin og kristiligi fólkaflokkurin, seta tí fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Málið verður beint í landsstýrið.

Minnilutin, fólkaflokkurin, kann ikki taka undir við uppskotinum, sum tað fyriliggur nú. Fólkaflokkurin fer at koma við einum øðrum og meira víttfevnandi uppskoti á hesum øki.

Ein annar minniluti, sambandsflokkurin, mælir tinginum til at samtykkja uppskotið hjá sambandsflokkinum.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskotið til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

82 Bygging av sjónvarpshúsi í Eysturoynni.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Jóhs. Martin Olsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikan fyri, at nýggi sjónvarpsbyggingurin verður bygdur í Eysturoynni.

Viðmerkingar:

Á løgtingi hevur mangan orðaskifti staðist av ov lítlari decentralisering her á landi, tá ið talan t.d. hevur verið um almennar stovnar, sum allir verða lagdir í høvuðsstaðnum.

Nú er tað eingin loyna, at røddir hava verið frammi innan núverandi landsmyndugleikar, sum ávara ímóti, at okkara høvuðsstaðarumráði figgjarliga verður enn meiri upphitað enn tað frammanundan er, tí hetta kann koma aftur um brekku og fáa negativar avleiðingar fyri alt landið á ymiskan hátt.

Ein av orsøkunum til, at høvuðsstaðurin hevur ment seg til tað, hann í dag er orðin til, er tað virksemi og harav inntøkur, sum teir nógvu almennu stovnarnir hava ført við sær.

Tá ið talan hevur verið um at latið onnur øki í landinum nomið nakað av tí menning, sum umrøddu stovnar kasta av sær, hevur orðið bygdamenning, sum nærmast er orðið eitt gandaorð uppundir løgtingsval, verið nógv nýtt, men úrslitið í roynd og veru er lítið áhugavert.

Nú talan er um at byggja nýtt sjónvarpshús, eiga møguleikarnir fyri, at hesin stovnur verður lagdur uttan fyri høvuðsstaðin at vera kannaður gjølla, t.d. hevur verið framhildið av sakkønum at gera eitt studio í sunnara parti av Eysturoynni, til hetta krevst optiskt sýn til mastararnar Húsareyni — og sagt verður, at hetta er til staðar.

Men fyrst og fremst eigur at verða kannað, um SvF-stovnurin ikki eins væl kann byggjast uttan fyri Havnina t.d. í Eysturoynni.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram tann 3. mars 1987 av Jóhannes Martin Olsen, løgtingsmanni, og varð eftir 1. viðgerð tann 6. mars 1987 beint í mentanar- og skúlanevndina. Málið snýr seg um uppskot til samtyktar, har álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikan fyri, at nýggi sjónvarpsbygningurin verður bygdur í Eysturoynni. Nevndin hevur viðgjørt málið og er undir viðgerðini komin til ta niðurstøðu, at stórir hølisstrupulleikar eru hjá sjónvarpinum, men nevndin er ikki orðin samd um, hvussu hesir hølistrupulleikar eiga at loysast.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard og Hergeir Nielsen) vísir á, at landsstýrið arbeiðir við spurninginum um nýtt sjónvarpshús, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skunda undir arbeiðið at útvega Sjónvarpi Føroya søniligar arbeiðsumstøður.

Ein annar minniluti (Eilif Samuelsen og Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskotið óbroytt.

Hin triði minnilutin (Óli Breckmann) tekur undir við tankanum í uppskotinum um, at framleiðslan av føroyskum og føroyskum sjónvarpssendingum eigur ikki og nýtist ikki at liggja á einum og sama stað.

Eitt sendistudio er nóg mikið til at senda alt tað tilfar og meir aftrat, sum føroyski almenningurin kann taka ímóti teir tímar á døgninum, sum sent og hugt verður í sjónvarp.

Tí eigur løgtingið í staðin fyri at byggja borg til henda almenna monopolstovn — antin tað so er í Havn, Eysturoy ella aðrastaðni í landinum — heldur at virka fyri eini miðspjaðing av framleiðslu av føroyskum sjónvarpssendingum.

Ein praktiskur fyrimunur liggur í, at sendistudiið liggur í høvuðsstaðnum, har landsins fyrisiting, løgting, landsstýri, ráð og nevndir halda til og fundast.

Men plaseringin av sendistøðini eigur tó undir ongum umstøðum at vera ein forðing fyri, at sjónvarpsfeløg virka og sjónvarpsverkstøð liggja spjadd kring landið.

Løgtingið eigur til tess at styrkja fólkastýrið við viðkaðum pressufrælsi, so tað ikki bert umfatar dagspressuna, men eisini fer at fevna tey bæði almennu tíðindamonopolini, at leggja eitt lógligt grundarlag, sum demokratiserar SV-monopolið. Uppgávan hjá SvF eigur at verða avmarkað til t.d. verandi senditíð av føroyskum sendingum, meðan restin av senditíðini verður leigað út til felagsskapir, sum undir pressulógini hava til uppgávu at gera føroyskar sendingar, sum hesi feløg sleppa at senda ávísar ásettar tíðir um mánaðin ella vikuna.

Fleiri av sjónvarpsfeløgunum eru til enn, men tó ikki virkin longur, ti tey óbeinleiðis eru bannað við lóg. Felagið í Eysturoy er tíverri avtikið, og peningagognin latin øðrum almennum stovni, so at Eysturoyggin er eina ringast fyri, tá umræður eitt grundarlag til at gera sendingar.

Men hetta kann saktans bøtast við skjótleika, um lógligar fyritreytir verða skaptar fyri, at onnur enn bert eitthvørt almennt SvF hevur loyvi til at framleiða tíðindi, upplýsandi og undirhaldandi sendingar til henda fjølmiðil.

Minnilutin setir tí fram hetta:

ískoytisuppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum í staðin fyri at fara undir bygging av nýggjum dýrum sjónvarpshúsi heldur at leggja fyri tingið eina heildaraetlan fyri framleiðslu av sjónvarpssendingum á pressufrælsum grundarlag umframt eftir verandi monopolskipan.

Verður hetta uppskot samtykt og sett í verk, gevur tað Eysturoynni sama ræett sum øðrum pørtum av Føroyum til at seta sín dám á innihaldið í einum meir fjøltáttaðum og margfaldnum føroyskum sjónvarpi.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskotið frá minnilutanum (Jóannes Dalsgaard og Hergeir Nielsen) fall við 13-0 atkvøðum. Uppskotið frá minnilutanum (Óla Breckmann fall við 13-0 atkvøðum. Eftir uppskoti frá ivan Johannesen varð atkvøtt við navnakalli um upprunauppskotið, sum varð samtykt við 17-3-10-2. Atkvøtt varð soleiðis:

Ja atkvøddu:
Anfinn Kallsberg,
Olaf Olsen,
Eyðun Viderø,
Jógvan Sundstein,
Dánjal Larsen,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Agnar Nielsen,
Jógvan I. Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Eilif Samuelsen,
Jøgen Thomsen,
Asbjørn Joensen,
Signar Hansen,
Heini O. Heinesen,
Adolf V. Hansen,
Tordur Niclasen,

Nei atkvøddu:
Henrik Old,
Jóannes Dalsgaard,
Hans Jacob Debes,

Atkvøddu ikki
Óli Breckmann,
Sverri Midjord,

Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Tórálvur Mohr Olsen,
Tummas Arabo,
Hilmar Kass,
Hergeir Nielsen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Burturstaddir: Svend Aage Ellefsen,
og Eliesar Arge.

83 Breiðkan av vegnum millum Strendur og Selatrað.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Johannes Martin Olsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at skipa so fyri at vegastrekkið av Strondum norður til Selatrað verður breiðkað og sett í forsvarligan stand.

Viðmerkingar:

Fyri mongum árum síðani kundi serliga íbúgvararnir í Kolbeinagjógv, Morkrunesi og Selatrað frøast yvir, at nú var farið undir at breiðka ein alt ov smalan

og harvið ótryggan landsveg frá Raktanga (Láhálsi) og norður eftir mót Selatrað, men tíverri var hendan gleðin stokkut fyri íbúgvararnar á nevndu plássum, arbeiðið var niðurlagt, og er enn tann dag í dag ikki uppafturtikið.

Nú hava landsmyndugleikarnir sett í verk kring landið eina rutukoyring, eisini á umrødda vegastrekki, sum fyri bussar og persónbilar o.a. er ofta og títt ein kappkoyring frá einum til næsta víkiplássi, skiftivís stopp í ovaru og niðaru síðu, og førir hetta við sær eina rød av vandamiklum situatiónum á hesum eins og á líkandi vegastrekkjum her í oynni og aðra staðir.

Um veturin, tá ið kavin liggur á nevnda vegastrekki er støðan m.a. tann, at fyri tað fyrsta er nærum ógjørligt at nýta tey nýggjastu kavaamboðini á hesum leiðum, tað er vegurin alt ov smalur og vánaligur til, hetta førir uppaftur við sær, at skúlabussar og rutubilar o.a. fáa tað serliga torført at koma vegin fram og verða førararnir, ið koyra hesa leið mangan illa fyri, av tí at ilt er at halda hesar breiðu bilarnar á einum so smølum vegi.

Nú ljóðar, at nógv størri bilar skulu setast inn á rutuna til Selatrað, og kann ein og hvør tá siga sær sjálvum, at hetta ikki er rætt, og tí sum helst kann enda galið.

1. viðgerð 10. mars. Málið varð viðgjørt saman við tingmáli nr. 84: Um úthyggjan av vegakervinum í Eysturoy, og vóru bæði beind í samferðslunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av tingmanni Johs. Martin Olsen tann 3. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 10. mars 1987 beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Tórálvur Mohr Olsen, Asbjørn Joensen og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum til samtyktar.

Minnilutin (Eyðun Viderø og Svend Aage Ellefsen) vísir til løgtingsmál nr. 67/1986 og tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Johs. Martin Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Viðvíkjandi trygdarspurninginum hevur nevndin havt fundir við Landsverkfrøðingin og umboð fyri Ráðið fyri ferðslutrygd.

Undir viðgerðini er upplýst, at talan er um, at stórir bilar — bussar upp til 40 persónar — skulu setast inn á rutuna til Selatrað og hevur hetta verið orsøkin til, at nevndin hevur arbeitt nakað meira við málinum. Nevndin hevur havt fund við Landsverkfrøðingin og umboð fyri Ráðið fyri ferðslutrygd. Út frá hesum samráðingum er tað vorðið púra greitt fyri nevndini, at tað er ikki forsvarligt at seta so stórar bussar inn á nevnda vegastrekki. Hetta tekur ein samd nevnd til eftirtektar og setir fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið sum skjótast at heita á avvarðandi stovn(ar), í samráð við Ráðið fyri ferðslutrygd at seta neyðug trygdartiltøk í verk á hesum vegastrekki og á øðrum vegastrekkjum, har tørvur er fyri slíkum tiltøkum.

Á fundinum við Ráðið fyri ferðslutrygd varð m.a. upplýst, at vegastrekkið Lopra/Akrar, ið lýst er at lúka 80 km/t koyring átti í staðin at komið undir 50 km/t regluna.

Her verður hugsað um tunga ferðslu og at skúlabørn geru nógva nýtslu av umtalaða vegi.

Annars varð í hesum sambandi vist til § 60 í ferðslulógini.

Eisini varð víst á skúla við Gøtugjógv og ferðsluviðurskiftini, ið har gera seg galdandi.

Loksins skal nevnast, at tað undrar Ráðið fyri ferðslutrygd, at nýggir høvuðsvegir eftir ætlan koma at liggja millum húsa, heldur enn uttan fyri bygd øki. Í hesum sambandi varð tunnilsvegurin Oyrareingir og vegurin Velbastað-/Syðradal nevndur.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið til samtyktar frá Johs. Martin Olsen fall við 8-0, og uppskotið til samtyktar frá samdari samferðslunevnd samtykt við 26-0 atkvøðum.

84 Um útbygging av vegakervinum í Eysturoy v.m.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Johs. Martin Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at gera skitsuprojekt og kostnaðaræt1lan av vegagerðum og tunlum í Eysturoy:

1. Millum Kambsdal og yvir millum Fjarða,
2. Millum Selatrað og Oyri,
3. Millum Saltnes og Strendur,
4. Millum Toftir og Runavík,
5. Møguliga aðrastaðir har, sum landsverkferðingurin metir, at tað hoyrir við til eitt heildar vegakervi í Eysturoynni og kunna løgtingið um úrslitið skjótast møguligt og í seinasta lagi á ólavsøku 1988, og í størst møguligan mun fáa skipað hesar ætlanir við onnur anlegsarbeiðir í Eysturoynni, soleiðis at nytta beinleiðis kann fáast av grótinum, sum kemur úr tunlunum, t.d. til havnagerðir.

Viðmerkingar:

Samferðslumøguleikar okkara innanoyggja hava verið, eru og koma at vera áhaldandi útbygdir, alt eftir førvi, fíggjarligari orku og øðrum viðurskiftum, sum kunnu gera seg galdandi.

Uppí í málsetningin um at útbyggja samferðslumøguleikarnar so gott, trygt og bíligt sum møguligt, er stytting av farleiðum ein náttúrligur partur, og stytting av vegalongd í Føroyum krevur sum oftast gerð av bergholum, í Eysturoynni kunnu gerast nógvar styttingar, av vegafarleiðunum, sum minka um ferðslutættleikan av akførum á vegnum, og harvið bøta um tryggleikan, gera ferðingina skjótari og ódýrari, og økt um menningina og trivnaðin, herafturat kann grótið frá tunnilsgerðum beinleiðis verða nýtt til anleggsarbeiðir, t.d. til havnagerðir.

Nevnast kann farleiðin gjøgnum tunnil úr Kambsdali, og yvir millum Fjarða, hetta hevði stytt hesa farleiðina við 12 km. Nú bygging er byrjað í Kambsdali kundi grótið verið nýtt til anleggsarbeiði í Kambdali. Fuglafirði, Gøtu ella

Leirvik.

Tað er langt síðani samtykt at gera veg millum Selatrað og Oyri, men tá Eysturoyartunnilin kom, minkaði áhugin fyri hesi vegagerð, men nú halda vit, at tað er tíð uppá at taka hesa vegagerð upp aftur, og grótið frá einum tunli gjøgnum Veðranes kundi komið til gagns, m.a. til havnargerð á Selatrað ella á Oyri, hetta vildi stytt farleiðina eftir vegnum millum Selatrað og Oyri, við 33 km.

Inni í myndini um ferðslu er eisini at leggja landsvegirnar soleiðis, at teir liggja mest møguligt uttan fyri tætt bygd økir, og í hesum samanhangi eru tankar frammi um at beina ferðsluna av Toftum gjøgnum eitt stutt berghol yvir um í óbygt lendi, og í aftur verandi veg, ella í tann nýggja landsvegin, sum ætlan er at gera ovalaga á Glyvrum, Saltangará og Runavík, hetta hevði eisini stytt um hesa farleið, og grótið kundi verið nýtt til havnargerð á Toftum.

Eitt gamalt hugskot hevur verið at gjørt brúgv um Skálafjørðin, har sum tað er smalast millum strendur og Saltnes, har er rættiliga grunt vatn, men henda ætlan er helst strandað á, at siglingarmøguleikarnir til stór skip ikki máttu skerjast, og brúgv við siglingarmøguleikum til slík skip hevur verið ov kostnaðarmikil, eisini hevði ein slík brúgv skapt stórar broytingar í umhvørvinum.

Men nú verður í rámasta álvara tala um undirsjóartunlar, og tí kann hugsast, at ein loysn var at gjørt ein slíkan tunnil millum Stendur og Saltnes, eina slíka farleið hevur Skálafjørðurin sum heild nógv brúk fyri, her er stórt virksemi, og her býr væl av fólki báðumegin, men sjálvsagt hava brúkt fyri hvørjum øðrum.

Farleiðin millum Toftir og Strendur minkar við 30 km, og ferðslutrættleikin av akførum í tí innara partinum av Skálafjørðinum minkar munandi.

1. viðgerð 10. mars. Málið varð viðgjørt saman við tingmáli nr. 83: Vegur Strendur — Selatrað, og vórðu bæði beind í samferðslunevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum tann 3. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 10. í sama mánaða beint í samferðslunevndina.

Í uppskotinum verður mælt til, at gjørt verður skitsuprojekt og kostnaðarætlan av ávísum vegagerðum og tunnlum í Eysturoy.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Tórálvur Mohr Olsen, Asbjørn Joensen og Heini O. Heinesen) er av teirri áskoðan, at tann í uppskotinum ætla vega- og tunnilsgerð liggur nakað langt frammi í tíðini og metir, at tað ikki kann lata seg gera at útvega eitt skitsuprojekt, tá talan er í ov stóran mun um eitt framtíðarprojekt. Eitt slíkt projekt inniber óvissu, og eisini kunnu spurningar um figgjarorku taka seg upp. Ilavnast má eisini í huga tað lutfall, eitt slíkt tiltak kann fáa í mun

til almennar íløgur og figgjarorku.

Sostatt tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen og Eyðun Viderø) ásannar, at á ferðsluøkinum í Eysturoynni eins og aðrastaðni er stórur tørvur á umlegging og útbygging av veganetinum, men minnilutin kann ikki taka undir við uppskotinum um at taka eitt ávíst øki burturúr fyri har at gera skitsuprojekt og kostnaðarætlan av vegagerðum og tunnlum, men vísir á løgtingsmál nr. 67/1986: Ábøtur á vegastrekkið Kollafjørður/Hósvík lagt fram av Fólkaflokkinum, har samferðslunevndin í áliti við uppskoti til samtyktar áleggur landsverkfrøðinginum sum skjótast at koma við uppskoti og kostnaðarmeting um neyðugar ábøtur á høvuðsvegakervið, og í hvønn mun hesar út frá einum ferðslu- og trygdarligum sjónarmiði skulu raðfestast. Minnilutin setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Jóhs. M. Olsen) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at tað verður samtykt.

2. viðgerð 9. apríl. Uppskotið fall við 4-0 atkvøðum.

85 Flytan av umsitingini av tyrlutænastuni

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at áleggja landsstýrinum at skipa fyri at umsitingin av tyrlutænastuni verður flutt til flogvøllin í Vágum.

Viðmerkingar:
Nú Strandfaraskip Landsins hevur latið byggja bygning til farm o.a. við flogvøllin í Vágum, og tyrlan »Snýpan« hevur fasta stað á flogvøllinum, er eingin orsøk til at umsiting av tyrlutænastuni er í Tórshavn.

Nógv verður tosað um miðsavnan og miðspjaðing, eisini um bygdamenning, men tað verður alt ov sjáldan gjørt nakað ítøkiligt við henda spurning.

Tyrlan sjálv og tyrluumisitingin hoyra náttúrliga saman. Og tí verður mælt til at umsitingin sum skjótast verður løgd við flogvøllin í Vágum.

1. viðgerð 5. mars. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 13. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Ivani Johannesen tann 3. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 5. mars s.á. beint í samferðslunevndina.

Í uppskotinum verður mælt til, at umsitingin av tyrlutænastuni verður flutt til flogvøllin í Vágum.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og ásannar, at nógv hevur verið tosað, men lítið ítøkiligt gjørt til tess at fremja eina miðspjaðan av almennum stovnum her á landi.

Hetta hevur Føroya kommunufelag eisini fleiri ferðir gjørt vart við.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Heini O. Heinesen, Tórálvur M. Olsen, Asbjørn Joensen og Eyðun Viderø) ásannar, at umsitingin av tyrlutænastuni er ein integreraður partur av strandferðsluni og tekur tí ikki undir við uppskotinum, men setir í staðin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið í størst møguligan mun og á skilabesta hátt at skipa fyri miðspjaðan av almennum stovnum.

Minnilutin (Jóhs. M. Olsen og Sv. Aage Ellefsen) tekur í fyrsta lagi undir við uppskotinum frá I. Johannesen og í øðrum lagi undir við uppskoti meirilutans.

Minnilutin (Sv. Aage Ellefsen og Eyðun Viderø) hevur umframt hesar viðmerkingar:

Tá samgongan í hesum døgum hevur til viðgerðar verkætlan fyri stovnsetan

av føroyskum flogfelag til millumlandaflúgving, verður inniliga heitt á samgonguna sum skjótast gjørligt at fáa staðfest, at fyrisitingin av einum komandi føroyskum hálv- ella heilalmennum flogfelag náttúrliga verður løgd við flogvallin í Vágum.

2. viðgerð 18. mars 1987. Upprunauppskotið fall við 6 0 atkvøðum. Uppskotið frá meirilutanum í samferðslunevndini samtykt við 21-0 atkvøðum.

86 Avtøka av útvarps- og sjónvarpsgjøldum.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið á Ólavsøku 1987 uppskot um avtøku av lógum og reglugerðum um útvarps- og sjónvarpsgjald. Nevndu stovnar skulu framyvir hava inntøku, ið samsvarar við núverandi gjøld, yvir fíggjarløgtingslógina.

Viðmerkingar:

Útvarps- og sjónvarpsmóttakarar eru í at kalla øllum íbúðum í dag, og er tí eingin grund til at hava serstakar inntøkulógir fyri hesar stovnar. Føroya løgting hevur í mong ár á øllum øðrum økjum lóggivið út frá tí prinsippi, at inntøkurnar ikki skulu eyramerkjast.

Útvarps- og sjónvarpsgjald er ikki annað enn kamufleraðar skattainntøkur, og tilsvarandi fiktiv lægri landskassaútreiðslur. Harumframt er núgaldandi skipan órættvís á fleiri økjum. Tildømis megu skip og bátar gjalda útvarpsgjald av lógtvungnum radiomóttakarum, teir sonevndu neyðmóttakarum. Nevnast kann eisini, at útróðrarmenn og onnur, ið hava fyri neyðini at fylgja við, hvat sagt verður um veðurvánirnar, mangan gjalda fleiri gjald, hóast tey bert hava tvey oyru at lurta við. Tildømis má ein útróðrarmaður gjalda fyri tann móttakaran hann hevur heima, tann hann hevur í egningarskúrinum, tann í bilinum og tann í lugarinum á bátinum umframt tann lógpliktiga móttakaran í stýrhúsinum. Ella við øðrum orðum: hann má gjalda 5 útvarpsgjøld fyri at tryggja sær altíð at hoyra veðurvánirnar.

Núgaldandi skipan er soleiðis, at milliónin gurin og pensiónisturin gjalda líka. Hvat eisini vildi verið órættvíst, um ikki so stórur munur var í inntøkunum. Útvarps- og sjónvarpsgjaldið eru tyngjandi lutur hjá fólkapensiónistum, og so lítið tey fáa at liva fyri í dag, er neyðugt, at vit lætta mest gjørligt um byrðar teirra.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð viðgjørt saman við tingmáli nr. 91: Telefonendurgjald til pensiónistar. Tingmál nr. 86 varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fram av Framsóknarflokkinum tann 3. mars 1987 og undir fyrstu viðgerð tann 6. mars sama ár beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgin Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og undirstrikar, at politiska støða Sambandsfloksins til fyriliggjandi spurning er, at Útvarp Føroya skal vera ein sjálvfíggjandi stovnur og skal hvíla í sær sjálvum.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) vísir til løgtingsmál nr. 102/1986: Broyting í útvarpslógini, lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni.

2. viðgerð 31. mars. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðum.

87 Demokratisk avgerð um brennistøðina í Leirvík

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Fram sóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um fólkaatkvøðu í Leirvík um brennistøð IRF's skal byggjast í kommununi.

§ 1. Fólkaatkvøða verður hildin í Leirvíkar kommunu millum tey, sum valrætt hava til kommunuval, um IRF skal verða loyvt at byggja brennistøð í kommununi.

§ 2. Føroya landsstýri fyriskipar, og Valnevndin fyri Eysturoy og valstýrið fyri Leirvíkar bygdarráð halda atkvøðuna smb. § 1. Í tann mun tað er gjørligt, verður lógin um val til Føroya løgting nýtt sum grundarlag fyri atkvøðustøðum, atkvøðugreiðslu, uppteljing v.m.

§ 3. Fólkaatkvøðan verður hildin týsdagin 28. apríl 1987.

§ 4. Atkvøðuseðilin skal innihalda spurningin: »Skal avgerðin um at byggja brennistøð í Leirvíkar kommunu standa við makt?« Møguleiki skal vera við X (krossi) at atkvøða »Ja« ella »Nei«.

lagtingslov om folkeafstemning i Leirvik om IRF's forbrændingsanlæg skal opføres i kommunen.

§ 1. Folkeafstemningen finder sted i Leirviks kommune blandt dem, der har valgret til kommunevalg, om IRF skal have tilladelse til at bygge forbrændingsanlæg i kommunen.

§ 2. Færøernes landsstyre forestår og lagtingsvalgnævnet for Eysturoy og valgstyret for Leirviks bygderåd afholder afstemmningen, jfr. § 1. I det omfang, det er muligt, finder loven om valg til Færøernes lagting anvendelse for afstemningssteder, stemmeafgivning, optælling m.v.

§ 3. Folkeafstemningen finder sted tirsdag den 28. april 1987.

§ 4. Afstemningssedelen skal indeholde spørgsmålet: »Skal afgøresen om at opføre forbrændingsanlæg i Leirvík kommune stå ved magt?« Det skal være muligt ved X (kryds) at stemme »Ja« eller »Nej«.

§ 5. Møguleikar eiga at verða givin burturstøddum og øðrum at greiða brævatkvøðu eftir kapitul XII í løgtingsvallógini.

§ 6. Vanligur meiriluti av gildugum atkvøðum er ráðandi.

§ 7. Verður úrslitið av atkvøðugreiðsluni, at loyvi verður givið at byggja brennistøðina, setur henda lóg ongar seinni avgerðir brennistøðini viðvíkjandi úr gildi.

§ 8. Til úrslitið av fólkaatkvøðuni fyriliggur, má einki arbeiði fara fram uppá brennistøðina á Hagaleiti.

§ 9. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

§ 5. Der skal gives fraværende og andre mulighed for ved brev at afgive stemme efter kapitel XII i lagtingsloven.

§ 6. Almindeligt stemmeflertal er gældende.

§ 7. Bliver resultatet af afstemningen, at tilladelse gives til at bygge forbrændingsanlægget, ophæver denne lov ingen senere afgørelse vedrørende forbrændingsanlægget.

§ 8. Til resultatet af afstemningen foreligger, må intet arbejde udføres på forbrændingsanlægget på Hagaleiti.

§ 9. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Tá val var til bygdarráð í Leirvíkar kommunu í 1984, var eingin av veljarunum í kommununi vitandi um, at brennistøð IRF's skuldi byggjast í Leirvíkar kommunu. Tí fekk einki valevni boðað frá sínI støðu til málið áðrenn valið, einsvæl og veljararnir ikki fingu høvi at taka støðu fyri ella móti hesum fyri bygdina altavgerandi máli. Síðan er tað hent, at ikki færri enn 240 íbúgvar í kommununi hava boðað Føroya Landsstýri frá, at tey eru ímóti, at brennistøðin verður bygd í Leirvík.

Hetta er so stórt tal av íbúgvunum, at tað má geva grund til eftirtanka. Málið kann lætt elva til split millum bygdarfólkini, verður ein fólkaatkvøða hildin um málið, kann roknast við, at tey flestu respektera úrslitið uttan mun til, um tað verður ja ella nei til brennistøðina. Sum er, eru bert gitingar um støðuna hjá teimum, sum av prinsippi ikki skriva undir felags áheitanir ella felags mótmæli. Tað má tí vera rætt á ein demokratiskan hátt at spyrja borgararnar, um teir vilja hava brennistøðina har í kommununi ella ikki.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Framsóknarflokkinum tann 3. mars 1987 og varð eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1987 beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjort málið og undir viðgerðini havt fundir við umboð fyri FNU, Mótstøðubólkin í Leirvík, IRF, Tórshavnar Býráð og landsstýrismannin í kommunumálum.

Av ti at bygdarráðið í Leirvík er í útlondunum, hevur nevndin ikki havt høvi til at hava fund við bygdarráðið.

Endamálið við uppskotinum er við lóg at skipa fyri fólkaatkvøðu, um brennistøðin hjá IRF skal byggjast úti á Vík í Leirvík ella ikki.

IRF varð sett á stovn av Føroya Kommunufelag 19. mars 1979, og eru nærum allar kommunur uttanfyri Suður-streymoy og útoyggjarnar limir í felagsskapinum.

Arbeitt varð skjótt við at fáa brennistød setta á stovn, og frá juli 1979 til mars 1980 vóru samráðingar millum landsstýrið, Tórshavnar kommunu og IRF um at finna eina felags loysn, men sum kunnugt fekst eingin semja í lag um hetta.

Síðani helt IRF fram við arbeiðinum, og í september 1980 mælti friðingarnevndin í Eysturoynni til, at IRF fekk loyvi til at byggja á Høganesi. Umsókn um byggiloyvi varð latin Nes kommunu og játtað tann 30. december 1980.

Byggingin varð fyrireikað og neyðug lán tikin upp, og síðani varð arbeiðið sett í gongd.

Í februar 1982 varð málið tikið upp í Yvirheilsunevndini — tó ikki sum kærumál — og var úrslitið hetta, at heilsumálið varð tikið upp til nýggja viðgerð frá botni av. Endaliga avgerð kom frá Yvirheilsunevndini á heysti 1982 og noktaði hendan byggingina.

Henda avgerð varð løgd fyri landsstýrið, sum í 1983 staðfesti avgerðina.

Aftaná hesa avgerð setti IRF seg í samband við myndugleikar í Hvalvík, og varð mynduglеikaviðgerðin og innanhýsisviðgerðin lokin á vári 1984, tó soleiðis at broytingin í byggisamtyktini ikki var avgreidd.

Broytingin varð samtykt í landsstýrinum um mánaðarskifti november-december 1984, men varð málið ikki avgreitt frá Landsskrivstovuni, tá løgtingið við lóg steðgaði málinum dagin fyri løgtingsvalið 1984.

Síðani hevur IRF fingið til vegað øll neyðturvilig loyvi til at fara undir bygging av brennistað úti á Vík, sunnan fyri Leirvík, og er arbeiðið nú farið í gongd.

Nevndin hevur viðgjørt málið og skal í stuttum verða greitt frá teimum sjónarmiðum, sum eru komin fyri dagin undir nevndarviðgerðini.

Umboðini fyri FNU gjørdu undir viðgerðini nevndina varðuga við, at tað bert uppfatan FNU's, ikki var tørvur á meiri enn einari brennistød í Føroyum og heittu umboðini tí á umhvørvisnevndina um at mæla til, at byggingin í Leirvík verður steðgað á einhvønn hátt.

Umboðini fyri FNU løgdu eisini stóran dent á, at sett verður á stovn einhvør skipan við skiljing av ruskinum við kelduna, og at so nógv sum møguligt av ruskinum verður endurnýtt.

Mótstøðubólkurin í Leirvík gjørdi vart við, at bólkurin í prinsippinum einki hevði ímóti ruskbrenning, men bólkurin undirstrikaði, at hann bar ótta fyri

dálking av umhvørvinum at hann serliga bar ótta fyri teimum trupulleikum, ið fóru at standast av ti øktu ferðsluni til og frá brennistøðini.

Umboðini fyri IRF løgdu ógvuligan stóran dent á, at øll tey neyðturviligu loyvini vóru fingin til vega, og hildu umboðini ikki, at Føroya løgting hevði nakran rætt til at steðga IRF í ætlan sini um brennistøð út á Vik.

IRF-umboðini upplýstu fyri nevndini, at felagsskapurin í framtíðini fer at leggja ógvuliga stóran dent á, at innsavningarskipanin verður bygd upp soleiðis, at ruskið verður skilt við kelduna. Í hesum sambandi upplýstu umboðini, at ætlanin varð at taka upp samráðingar við Tórshavnar býráð, soleiðis at báðir felagsskapir koma at nýta somu innsavningsskipan. Eisini løgdu umboðini fyri IRF dent á, at felagsskapurin í framtíðini fer at hugsa meira um endurnýtsluspurningin og at arbeiða við møguleikunum fyri, at so nógv sum møguligt av tí ruski, sum verður innsavnað, kann verður endurvunnið.

IRF-umboðini upplýstu eisini, at felagsskapurin hevur pláss til øskuna og til tað óbrenniliga burturkastið, eins og umboðini upplýstu, at umboðini høvdu fingið avtalu við Kommunekemi, ið skal taka ímóti tí kemikaliiburturkasti, sum IRF hevur skyldu til at taka sær av.

Umboðið fyri Tórshavnar býráð boðaði umhvørvisnevndini frá, at brennistøðin á Sandvíkarhjalla ikki undir verandi umstøðum kemur at taka ímóti ruski frá limakommunum í IRF.

Uppá fyrispurning, um brennistøðin á Sandvíkarhjalla var før fyri at brenna alt burturkast, sum brenniligt er, í Føroyum, upplýsti umboðið fyri Tórshavnar býráð, at hesin spurningur ikki kundi svarast. Umboðið fyri Tórshavnar býráð váttaði tað, sum borið varð fram av IRF umboðunum, at báðir partar eru sinnaðir at samskipa innsavningarskipanina við skiljing við kelduna, við burturbeining av kemikalium og óbrenniligum burturkasti.

Nevndin hevur, sum sagt, viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes og Johannes Martin Olsen) ger vart við ta misnøgd, sum ávísir bólkar kenna við avgerðina hjá IRF um at byggja brennistøð úti á Vík í Leirvík.

Hinvegin heldur meirilutin ikki, at løgtingið nú ger heint í at grípa inn í eitt mál, sum umsitingarliga er avgreitt samsvarandi galdandi lógum og reglugerðum. Byggiloyvi er givið av einum demokratiskt valdum bygdarráði, eins og neyðturvilig loyvi eru lógliga givin av einum landsstýri, ið sett er av einum demokratiskt valdum løgtingi og av teimum stovnum, sum landsstýrið umsitur.

Meirilutin tekur tí ikki undir við uppskotinum.

Hinvegin skilir meirilutin sum longu nevnt tann ampa, sum bygdarfólkið í Leirvík hevur av møguligum ferðsluligum og umhvørvisligum árinum av brennistøðini úti á Vík.

Meirilutin undirstrikar tí, at tað er av størsta týdningi, at allir myndugleikar gera sítt ítasta til tess at tryggja bygdarsamfelagið í Leirvík ímóti óhepnum

fylgjum av brennistøðini.

Tað er tí avgjørt neyðugt, at ein skilagóð loysn fæst á tilkoyringarspurningunum og øllum ferðsluspurningunum í sambandi við støðina úti á Vík.

Hvat umhvørvisliga spurninginum viðvíkur, vísir meirilutin til skriv frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni 5. november 1986. Meirilutin gerð vart við, at tað er ógvuliga umráðandi, at myndugleikarnir ansa væl eftir, at tær treytir, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sett í síni staðfesting av avgerðini hjá Leirvíkar heilsunevnd frá 7. juli 1986, verða fylgdar út í æsir.

Serstakliga verður hugsað um tað, sum Starvsstovan skrivar um forkanningar, ruskskipan, emissiónir, rakstur, eftirlit, flogøsku, røyk og frárensl.

Meirilutin setir útfrá hesum fylgjandi:

Uppskot

til

samtyktar

I: Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við avvarðandi myndugleikar og stovnar til tess at tryggja, at ferðslan til og frá tí komandi brennistøðini úti á Vík verður skipað soleiðis, at hon verður sum minst til ampa fyri bygdarfólkið í Leirvík, og um neyðugt gera broytingar og umleggingar í vegakervinum.

II: Álagt verður landsstýrinum at ansa eftir, at brennistøðin hjá IRF úti á Vík í Leirvík ikki fer undir virksemi sítt, uttan so at allar treytir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í skrivi 5. november 1986 eru loknar.

III: Álagt verður landsstýrinum gjøgnum Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at hava neyvt eftirlit við rakstrinum av brennistøðunum úti á Vík og á Sandvíkahjalla, soleiðis at hesar lúka tey til eina og hvørja tíð strangast galdandi umhvørviskrøv.

Ein minniluti Eliesar Arge vísir til løgtingsmál nr. 94/1986 og setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskot meirilutans í umhvørvisnevndini til samtyktar, samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 14. apríl. Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, skeyt upp, at atkvøðugreiðslan um § 1 fór fram við navnakalli, men tók hetta aftur. Adolf V. Hansen tók hetta upp aftur, og atkvøðugreiðslan fór síðani fram soleiðis:

Ja atkvøddu:	Agnar Nielsen, Ashjørn Joensen, Hilmar Kass, Adolf V. Hansen
Atkvøddu ikki	Anfinn Kalsberg, Olaf Olsen, Eyðun Videro, Dánjal P. Danielsen, Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen, Jógvan Olsen, Johannes Martin Olsen, Eilif Samuelsen, Henrik Old, Sverri Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes, Tordur Niclasen.
Burturstaddir:	Óli Breckmann, Svend Aage Ellefsen, Eliesar Arge, Pauli Ellefsen.

§ 1 er sostatt fallin við 4-0-24-4 atkvøðum, og er uppskotið sostatt burturfallið.

Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 23-0 atkvøðum.

88 VHF-móttakari-sendari á Eiðiskolli.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum beinanvegin at taka upp samráðingar við danska post- og telegrafvæsenet um at seta upp eina VHF-stød á Eiðiskolli. Geva hesar samráðingar ikki tað úrslit, at ein stød kemur upp at standa á sumri 1987, verður álagt landsstýrinum at leggja fyri tingið á ólavsøku lógaruppskot, sum heimilar Vaktar- og Bjargingartænastuni at keypa, uppseta og reka eina VHF-stød á Eiðiskolli.

Viðmerkingar:
Tann 30. apríl 1985 samtykti Føroya Løgting við 32-0 atkvøðum »løgtingslóg um bjargingarútgerð á bátum undir 5 BRT«. Henda lóg (tingmál nr. 51/1984 (vetrarting) áleggur øllum opnum bátum frá áttamannafari og uppeftir og øllum deksførum undir 5 BRT at hava neyðsendara av VHF slagi (ella tað slag, sum var um borð, tá lógin kom í gildi).

Frá ti partinum av Norðhavinum, har hesir bátar og deksbátar royna, fæst ikki samband við landsstød (Thorshavn Radio). Í mongum føri gevur lógarásetti neyðsendarin ein álskan tryggleika fyri teir, ið úti eru. Tað er lítið vert at hava góðan og dýran neyðsendara umborð, um eingin er á landi, sum hoyrir neyðsendingina.

Tað má vera skylda heimastýrisins, sum hevur lóggivið um hesar neyðsendarar, at syrgja fyri, at tey neyðugu tólini og vaktarskipan eru til taks. Hetta skuldi longu verið fingið til vega fyri fleiri árum síðan. Vit hava við 32-0 álagt mongum útróðrarbáti eina stóra útreiðslu, higartil til onga tryggleikanyttu.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Framsóknarflokkinum tann 3. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 6. í sama mánaða beint í samferðslunevndina.

Málið snýr seg um at seta upp eina VHF-stød á Eiðiskolli fyri at bøta um trygdina hjá teimum bátum, sum hava VHF-sendara umborð.

Nevndin hevur havt fundir við telefonverksstjóran og telegrafstjóran.

Tað er upplýst, at VHF-tænastan er undir danska P&T og verður røkt av telegrafstøðini í Havn. Henda tænasta varð tikin í nýtslu í 1965, og í seinnu helvt av sjeyti árunum varð hon nógv útbygd við nýtmótans avgreiðslubordum og framskatnum støðum á Mykinesi, í Svínoy, og á Hestinum í Suðuroynni. Í november 1980 varð nýggja útgerðin tikin í nýtslu, og bøtti hon munandi um VHF-tænastuna.

Telefonverksstjórin og stjórin á Telegrafstøðini ásanna, at teir ávístu trupul leikarnar finnast, men vísa á, at tað at seta eina VHF-stød á Eiðiskolli bøtir lítið um lurtilíkindini, har tey eru ringast, eitt nú í Djúpunum og inn ímillum oyggjarnar norðanfyri. Skal ein stød muna, eigur annað stað at veljast, møguligt uppskot er Slættaratindur, Gráfelli ella Nestindur á Kalsoynni.

Tað má eisini havast í huga, at kanal 16 er bæði kalli- og neyðkanal, og at flestu skipa lurta á hesi kanal, so sjálvt um Tórshavnar Radio hoyrir vánaliga á einum øki, so eru aloftast før spjadd víða um, sum eisini lurta á kanal 16 og kunnu koma til hjálpar.

Eisini er gamli neyðfrekvensurin 2182 kHz framvegis í nýtslu og er ofta meira tryggur enn kanal 16, tí hann hoyrist langt og eisini inn ímillum oyggjarnar.

Nevndin tekur upplýsingarnar viðvíkjandi spurninginum um at fára upp í hæddina á fjøllunum til eftirtektar og setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið at taka upp samráðingar við danska Post- og Telegrafvæsenet viðvíkjandi spurninginum um møguliga at fara upp í hæddina við nýggjari VHF-stød.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskot samferðslunevndarinnar til samtyktar samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskot uppskotsstillarans burturdottið.

89 Trygdartænasta í Føroyum

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir at seta eina 7-mannanevnd við einum limi úr hvørjum flokki at gera uppskot til eina føroyska trygdartænastu, sum skal umfata vaktar- og bjargingartænastu á sjógvi og landi, ferðslumyndugleika og sjúkraflutningstænastu. Nevndin eigur at miða ímóti at leggja uppskot fyri tingið longu í komandi tingsetu. Teir tankar, sum framførdir eru í viðmerkingunum, eiga at liggja til grund fyri, hvussu ein føroysk trygdartænasta skal virka.

Nevndin skal arbeiða sum millumtinganevnd.

Viðmerkingar:

Føroyska samfelagið er eitt lítið samfelag, og er tað tí neyðugt, at vit í mest møguligan mun bygna (strukturera) okkara hjálpar og tænastuveitingar á ein fyri Føroyar fyrimunarligan hátt.

Í Danmark og øðrum størri londum, eru ferðslumyndugleikarnir ein partur av politinum, vaktar- og bjargingartænastan ein partur av marinuni (søværnet), meðan sjúkraflutningstænastan ofta er undir einum triðja stovni, tildømis í Danmark undir privatum bjargingarfeløgum sum Falch og Zonen.

Skulu vit føroyingar hugsa um at gerast sjálvbjargnir, verður neyðugt longu nú at hugsa um, hvussu vit skulu bygna (strukturere) okkara hjálpar- og tænastuveitingar, so smá sum okkara viðurskifti eru, verður neyðugt at samskipa alt hetta undir og í einum stovni. Tað kundi tí verið hóskandi at broytt Vaktar- og Bjargingartænastuna til eisini at umfata tey viðurskifti á landi, sum hon (V&B) longu hevur á sjónum. Tænastustøðið hevði vaksið, í og við at manningin hevði umboðað størri øki og størri royndir. V&B hevur longu sum er ein ávísan politimyndugleika, og skuldi tað tí einki verið til hindurs fyri, at hon eisini kundi umsitið ein part av ferðslupolitinum (eins og hon ger á sjónum). Seinri, tá vit einaferð skulu yvirtaka politiið, so er ein bygnaður, sum er tillagaður føroyskum viðurskiftum, klárur og tilarbeiddur, og verður tað tí ikki neyðugt at hava ein stovn, sum ikki hóskar til føroysk viðurskifti.

Ein passandi byrjan kundi verðið gjørd í meginøkinum við at útvega 5 kombineraðar politi-sjúkraflutningsvognar og latið V&B havt teir undir hond og hørið so í bandi, at hesir koyrdu við tveimum fólkum í, sum høvdu kunnleika

til bæði ferðslupolitiskyldur og samarittakunnleika. Vognarnir kundu koyrt til dømis frá kl. 10 á kvøldi til kl. 6 á morgni og skuldu fingið boð frá vakthavandi á V&B um, hvar teir skuldu vera staddir til cina og hvørja tíð. Við góðari stýring frá V&B vildi eingin vognur nakrantíð verið meira enn 15-20 minuttir frá, har neyðsend boð komu frá. Td. í sjúkra- ella vanlukkutilburði. Trygdartænastan skuldi hvørja nátt kannað nakrar bilførarar, hvat ferð og spiritus viðvíkir. Vitanin um, at trygdartænastan altíð var á ferð, vildi økt um tryggleikan og harvið minkað um vanlukkurnar, umframt at ein sjúkraflutningsvognur altíð var í nánd.

Frá kl. 6 á morgni til kl. 10 á kvøldi skuldu vognarnir staðið á 5 ávísum støðum í nánd av tilkallivaktum, ið skuldu verið fólk, sum kundu komið frá sínum arbeiði til vognin uppá minni enn 5 minuttir. Tilkallifólkini skuldu øll verið samarittar. Á tann hátt fingu vit eina skjótari »ambulansutænastu« á teimum plássum, sum liggja longst burtur frá Landssjúkrahúsinum.

1. viðgerð 5. mars. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt 3. mars í ár av Framsóknarflokkinum.

Av tí at landsstýrið júst nú er við at hava eitt álit til sjúkraflutning klárt, og spurningurin um tilbúgvingarráð sambært brunalógini er við at verða sett í verk, eftir at brunalógin varð samtykt í seinastu tingsetu, verður ikki hildið, at hetta uppskot bevur nakað endamál í løtuni.

Ein samd sosialnevnd setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 26. mars 1987. Uppskotið fall við 3-0 atkvøðum.

90 Fráveruviðbøtur til sjófólk

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið á ólavsøku 1987 lógaruppskot um at endurgjalda okkara sjófólki (útróðrar- fiski- og annað sjófólk) tað, tey gjalda ov nógv í skatti orsakað av, at tey ikki kunnu nýta mong av teimum gøgnum og hentleikum, skattur teirra verður nýttur til.

Viðmerkingar:

Tá gingið varð yvir til tað sokallaðu bruttoskattaskipanina í 1978 vórðu allir privatir frádráttir í prinsippinum avtiknir. Síðani er onkur av hesum frádrátt um fingin innaftur í skattalógina, nevnast kann koyrifrádrátturin. Í 1978 var tað okkara sjófólk, sum misti teir størstu frádráttirnar, men hóast tað, so hava tey framvegis at kalla ongan frádrátt.

Nevnast kann, at hesi okkara sjófólk eru tey, sum

gera tað arbeiði í samfelagnum, sum krevur longri ella styttri skilnað frá familju og heimi.

Ikki til dagliga hava gleði ella gagn av teimum fyrimunum, sum tað almenna kann bjóða fyri skatta- og tollpeningin. Nevnast kunnu:

Nýtsla av landsvegum, bergholum, ítróttarhallum, kirkjum o.l., sjónvarpi, kvøldskúlum, bygdarhúsum v.m.

Vit føroyingar hava onga velferðartænastu til okkara sjófólk, og er tí eingin grund til, at hesi skulu gjalda eins nógvan skatt og tey, sum í fult mát kunnu nýta samfelagsins fyrimunir. Tað er tí einki órímiligt í, at hesi fáa eitt endurgjald, eina fráveruviðbót.

1. viðgerð 13. mars. Málið varð beint í skattanevndina, sum 18. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram 3. mars 1987 og við 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin kann ikki taka undir við málinum og setir sostatt einki uppskot fram.

2. viðgerð 24. mars 1987. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðu.

91 Telefonendurgjald til pensionistar.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

Løgtingslóg um telefonendurgjald til pensiónistar o.l.

§ 1. Allir pensiónistar o.l. fáa árliga úr landskassanum eitt telefonendurgjald uppá kr. 1.000,-.

§ 2. Hendan lóg kemur í gildi 1. januar 1988.

Løgtingslov om telefonrefusion til pensionister o.l.

§ 1. Alle pensionister o.l. far en årlig telefonrefusion fra landskassen på kr. 1.000,-.

§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Pensiónirnar til føroyskar pensiónistar eru danskar og viðgjørdar eftir donskum lønarviðurskiftum. Ein felagsnevnd, sum skal hava eyguni eftir, at pensiónirnar til føroyskar pensiónistar verða dagførdar við millumbili, sátur, men virkar ikki væl. Pensiónsreguleringarnar eru mangan fleiri ár og harvið fleiri túsund krónur afturút. Hartil kemur, at stórur inntøkulógir eru settar í gildi, og hava hesar minkað nógv um keypiorkuna av pensiónini.

Pensiónslógin er donsk, og fáa vit tí gjørt lítið við hana, men vit kunnu hjálpa pensiónistum umvegis, til dømis við at geva teimum eitt telefonendurgjald.

Telefonendurgjaldið kostar umleið 4-5 mió. kr.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð viðgjørt saman við tingmáli nr. 86: Avtøka av útvarps- og sjónvarpsgjøldum og varð beint í skattanevndina, sum 18. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram 3. mars 1987 og við 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Av tí at nevndin hevur fingið at vita, at landsstýrið arbeiðir við einum líknandi máli, mælir ein samd nevnd til at senda málið til landsstýrið.

Uppskotið er soljóðandi:

Málið verður sent landsstýrinum til viðgerðar.

2. viðgerð 24. mars. Uppskotið frá skattanevndini varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

92 Broyting í løgtingslóg um nátúrfriðing.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um nátúrfriðing.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um natúrfriðing verður gjørd hesa broyting:

1. Nýggjur VI. partur verður orðaður soleiðis: »VI. partur:
Kæra av avgerðum hjá yvirfriðingarnevndini,

§ 24.

Avgerðir, sum yvirfriðingarnevndin tekur, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið av einum og hvørjum, ið hevur verið á fundi undir viðgerðini av málinum ella hevur sent inn skrivliga greinagerð, av Føroya Jarðarráð og av einum hvørjum bý-/bygdaráði, sum hevur áhuga fyri málinum.«,
og »VI. partur« verður broyttur til: »VII partur«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Viðmerkingar:

Lóg um náttúruvernd hevur til endamáls at virka fyri, at tann húskaparligi vøksturin og harvið økti tørvur fyri samfelagsligum úthyggingum í minst møguligan mun ørkimlar ta upprunaligu náttúrunna, og verður í løgini nærri út

lagtingslov om ændring i lagtingslov om naturfredning.

§ 1.

I lov nr. 48 af 9. juli 1970 om naturfredning foretages følgende ændring:

1. Nyt VI. kapitel affattes således: »VI. kapitel: Anke af overfredningsnævnets afgørelser.

§ 24.

Afgørelser, som overfredningsnævnet træffer, kan inden 4 uger indankes for landsstyret af enhver, der har givet møde under sagen eller indsendt skriftligt indlæg, af landbrugsrådet og af enhver kommunalbestyrelse, der har interesse i sagen.«,
og »VI. kapitel« ændres til: »VII. kapitel.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

grcinað, hvørji serlig náttúrumhvørvi eiga at verjast.

Til at umsita hesa lóg er í hvørjari sýslu vald náttúrufriðingarnevnd, ið er samansett av sýslumanninum sum formanni og tveimum øðrum limum við fýra eykalimum, og skulu hesir sambært viðmerkingarnar til lógina »hava áhuga fyri náttúrufriðing«.

Yvir hesi nevnd situr ein Yvirfriðingarnevnd, ið er samansett av Sorinskrivaranum sum formanni, landsfornfrøðinginum, leiðaranum av náttúrugripasavninum og tveimum øðrum limum, ið løgtingið velur.

Í viðmerkingunum til lógina verður sagt, at skotið verður upp, at yvirfriðingarnevndin verður samansett av einum dómara, tveimum vísindamonnum (ein náttúrusøgufrøðingur og ein søgufrøðingur) og tveimum av løgtinginum valdum limum.

Henda lóg hevur verið í gildi síðani 1970, og í høvuðsheitinum má haldast, at hon hevur virkað eftir ætlan, sjálvt um persónar í ávísum málum ikki eru nøgdir við avgerðir, ið tiknar eru.

Fólkaflokkurin hevur í høvuðsheitinum einki ímóti lógini og samansetingini av nevndum, men við tað at avgerð hjá friðingarmyndugleikunum er endalig, og samansetingin av nevndunum einans hevur náttúruvernd sum mál, so heldur flokkurin, at avgerðir tiknar sambært hesa lóg kunnu hava so avgerandi búskaparligar og samfelagsligar fylgjur, at tað ikki er rætt, at tann politiski myndugleikin ikki skal hava endaliga avgerðarrættin, tá mál av sovorðnum slagi verða avgjørd.

Í vanligari talu verður hildið, at tá tað snýr seg um náttúrufriðing, so skal náttúran varðveitast í sínum upprunalíki, men vit hava eisini dømi um, at stað í gjølligari heildarætlan varð gjørd fyri øll náttúrufyrihrigdi, ið eiga at verða vard, soleiðis at friðingaravgerðir ikki í framtíðini verða tiknar tilvildarliga, sum ivaleyst dømi eru um.

Í vanligari talu verður hildið, at tá tað snýr seg um náttúrufriðing, so skal náttúran varðveitast í sínum uppruna líki, men vit hava eisini dømi um, at stað í náttúruni hava fingið størri virði, eftir at mannahond hevur verið á, og tí má friðing samskipast við búskaparligar og samfelagsligar fylgjur, um hvussu vit sjálv ynskja at broyta partar av henni, og sjálvandi náttúrunnar upprunaliga skap.

1. viðgerð 5. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Uppskotið er lagt fram av Fólkaflokkinum og varð eftir fyrstu viðgerð 5. mars 1987 beint í umhvørvisnevndina.

Málið snýr seg um at broyta løgtingslóg um náttúrufriðing soleiðis, at avgerð-

ir hjá Yvirfriðingarnevndini skulu kunna skjótast inn fyri landsstýrið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Hans Jacob Debes, Øssur av Steinum og Jóannes Dalsgaard) vísir til, at landsstýrið arbeiðir við spurningunum um broytingar í náttúrufriðingarlógini, við uppskoti til nýggja umhvørvislóggávu og við spurninginum um landsplanlóggávu.

Meirilutin heldur tí onga orsøk vera at broyta náttúrufriðingarlógina nú, men heldur tað vera rættast at bíða, til landsstýrið er liðugt at viðgera frammanfyri nevndu lógaruppskot.

Meirilutin skal tó gera vart við, at hesir spurningar hava stóran skund, tí náttúran er hótt á mongum økjum. Óbøtiligur skaði kann henda á náttúru okkara, um ikki verndartiltøk verða sett í verk móti fyrilitaleysari troytan av náttúruni og móti dálking frá húsarhaldinum og vinnulívinum.

Meirilutin setir út frá hesum einki uppskot fram.

Ein minniluti (Essa Arge) mælir til at samtykkja uppskot Fólkafloksins.

Ein annar minniluti (Johs. Martin Olsen úr Sambandsflokkinum) kann ikki taka undir við uppskoti Fólkafloksins. Hinvegin heldur minnilutin ikki galdandi reglur virka nóg væl og setir tí fram hètta

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið broytingar í náttúrufriðingarlógini, sum føra við sær, at yvirfriðingarnevndin bert verður ein kærustovnur.

2. viðgerð 26. mars. Lógaruppskotið frá Fólkaflokkinum, § 1, fall við 8-0 og uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í umhvørvisnevndini (Johs. M. Olsen) fall við 5-0 atkvøðum.

93 Løgtingslóg um oyggjamenningargrunn.

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, vegna Fólka flokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um oyggjamenningargrunn.

§ 1. Settur verður á stovn oyggjamenningargrunnur.

§ 2. Endamál grunsins er at veita lán til fremjan av øllum vinnuskapandi íløgum úti á útoyggjum okkara, og sum ikki hava vegasamband við høvuðsvegakervið í Norðoyum, Eysturoy, Streymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy.

§ 3. Lánsveitingin er treytað av, at viðkomandi eigari hevur í eginpeningi í minsta lagi 10 %. Lánið verður tryggjað við pantirætti í viðkomandi virki innanfyri 90 % av virðinum. Lánið verður avdráttarfritt fyrstu 3 árini. Restin verður at rinda aftur yvir 40 ár. Rentan er 3 % p.a.

2. stk. Um so er, at virkið skiftir eigara, fellur lánið ella tað, sum stendur eftir, til gjaldingar. Grunnurin kann tó geva loyvi til, at tað, sum eftir stendur av láninum, verður yvirført til nýggju eigararnar.

lagtingslov om udviklingsfond.

§ 1. Der oprettes en udviklingsfond.

§ 2. Fondens formål er at yde lån til at fremme arbejdsskabende investeringer på udøerne, der ikke har vejforbindelse til hovedvejene på Nordøyggjar, Eysturoy, Streymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy.

§ 3. Ydelse af lån er betinget af, at vedkommende ejer i det mindste har en egenkapital på 10 %. Lånet sikres ved pant i vedkommende virksomhed indenfor 90 % af værdien. Lånet er de første 3 år afdragsfri, lånet tilbagebetales derefter i 40 år, renten er 3 % p.a.

Stk. 2. Såfremt virksomheden skifter ejer, forfalder lånet eller det, der står tilbage af det, til betaling. Fonden kan dog give tilladelse til, at det, der står tilbage af lånet, bliver overført til de nye ejerne.

§ 4. Nevnd grunsins telur 3 limir, sum verða valdir av løgtinginum fyri 3 ár. Ein nevndarlimur gongur út hvørt ár, fyrstu 2 árini við lutakasti.

§ 5. Úr landskassanum verða í fíggjarárinum 1987 veittar grunninum 2 mió. kr. Annars tekur løgtingið á hvørjum ári støðu til játtanina til grunnin.

§ 6. Lán upp á meira enn 1 mió. kr. til einstakt virki krevur góðkenning frá landsstýrinum.

§ 7. Grunnurin hevur rætt til at taka lán við landskassaveðhaldi, tó hægst 3 mió. kr. um árið í 5 ár, fyrstu ferð í fíggjarárinum 1987.

§ 8. Landsstýrið ger við kunngerð reglugerð fyri grunnin.

§ 9. Grunnurin er leysur av øllum skatti.

§ 10. Løgtingslógin kemur í gildi 1. juni 1987.

§ 4. Fondens bestyrelse består af 3 medlemmer, som vælges af lagtinget for 3 år. Et bestyrelsesmedlem afgår hvert år, de første 2 år ved lodtrækning

§ 5. Af landskassen ydes der fonden i finansaret 1987 2 mio. kr. Iøvrigt tager lagtinget hvert år stilling til bevillinger til fonden.

§ 6. Lån på mere end 1 mio. kr. til en enkelt virksomhed skal godkendes af landsstyret.

§ 7. Fonden har ret til at optage lån med landskassegaranti, dog højst 3 mio. kr. årlig i 5 år, første gang i finansåret 1987.

§ 8. Landsstyret udfærdiger vedtægter for fondet, der bekendtgøres.

§ 9. Fonden er fritaget for enhver skat.

§ 10. Lagtingsloven træder i kraft 1. juni 1987.

Viðmerkingar:

Tann 11. apríl 1985 legdi undirritaði vegna Hin Føroyska Fótkaflokkin fram uppskot um »Løgtingslóg um oyggjamenningargrunn«.

Í viðmerkingunum varð m.a. ført fram:

Seinastu mongu árini hevur verið fardur politikkur her á landi innan samferðslubygging, soleiðis at koyrandi skal vera ímillum allar bygdir, har hetta tekniskt er gjørligt. Vit hava fingið vegasamband til nærum hvørja bygd á fastlandinum. Okkum vantar bert Múla og Gásadal. Eisini hava verið gjørdar sambindingar av oyggjum, soleiðis at vit fáa størri eindir. Vit eru í gongd í Haraldssundi í løtuni, soleiðis at eisini Haraldssund og Kunoy fáa vegasamband um stutta tíð.

Men tað kemst ikki uttan um, at tað liggur langt úti í framtíðini, áðrenn vit kunnu sambinda allar okkara oyggjar. Vit fingu tí undir seinasta landsstýri út vegað helikoptara fyri at økja um tænastustøðið og tryggleikan hjá íbúgvunum á

hesum plássum. Men tað er ikki nóg mikið bert at bøta um samferðslumøguleikarnar. Vit mugu eisini skapa vinnumøguleikar hjá íbúgvunum, soleiðis at tey trivast og fáa lut í samferðsluágóðanum sum heild.

Fyriliggjandi uppskot miðar ímóti at skapa fíggingarrammu um eitt vinnuliv á hesum plássum.

Vit eru samdir, at hesir vantandi vinnumøguleikar ikki einans eru á teimum plássum, ið hetta lógaruppskot umfatar, men vit hava valt at byrja har, sum størsti tørvurin er.

Lógaruppskotið gongur út uppá, at fíggingin av virkinum verður so lagalig, at hesir fyrimunir skulu vera størri enn tann meirikostnaður, tað altíð er, at seta virkir á stovn á hesum plássum. Í endamálsgreinini er treytin tann, at lán bert verða latin til bygdir, sum ikki hava vegasamband við høvuðsvegakervið. Tað umfatar sostatt Kirkju, Hattarvík, Svínoy, Trøllanes, Mikladal, Húsar, Syðradal, Mykines, Koltur, Hest, Nólsoy Skúvoy og Stóru Dímun.

Harafturat umfatar lógin Múla og Gásadal, tí hesar enn ikki hava fingið vegasamband við høvuðsvegakervið.

Grunnurin kann lata lán upp til 90 % av íløgum, meðan Menningargrunnurin hevur møguleikar at lata fígging til uppbyggingarkreditt, útflutningskreditt, rentustudning, studning til upplæring, gransking og vørumenning, hjálp til marknaðarkanning o.s.fr.

Hyggja vit at íbúgvaratalinum á hesum plássum, so sær tað soleiðis út pr. 1. januar 1986.

Fugloyar kommuna	61
Svínoyar kommuna	66
Mikladals og Húsa kommuna	121
Mykines kommuna	23
Hests kommuna	63
Nólsoyar kommuna	325
Skúvoyar kommuna	92
Tilsamans	751

Fólkatalið í hesum kommunum er minkað við 27 íbúgvum seinastu 2 árini.

Nevndin fyri grunnin er skipað á sama hátt sum nevndin í Menningargrunninum.

Uppskotið varð viðgjørt í Ídnaðarnevndini, sum 24. apríl 1985 legði fram álit í málinum.

Í álitinum verður m.a. sagt:

Á fundi við skrivaran í Menningargrunninum, Martin Djurhuus, er upplýst: at viðtøkur Menningargrunsins eru so liðiligar, at virki grunsins altíð kann laga seg eftir umstøðunum, við tað at nýggj átrokandi mál kunnu takast upp í arbeiðsøki grunsins. Herumframt slepst undan spjaðing yvir fleiri grunnar.

Menningargrunnurin hevur heimild til at veita lán við serligum treytum á

útoyggjum, t.d. kunnu 5 tey fyrstu árini verða avdráttarfrí. Heimild er eisini til at veita íløgustudning, studning til rindan av rentum, studning til vørumenning og studning til flutning av føroyskt framleiddum vørum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jørgen Thomsen, Henrik Old) kann ikki taka undir við uppskotinum, men vísir til tað, sum fört er fram omanfyri, nevniliga at Menningargrunnurin hevur heimildir, sum eru meira gagnligar fyri idnað á eini útoyggj enn tað, sum skotið verður upp. Her er tað serliga møguleikar, sum Menningargrunnurin hevur at veita studning til flutning av føroyskt framleiddum vørum. Tann størsti trupulleikin á eini útoyggj er nevniliga flutningur til og frá virkinum.

Vit kunnu eisini nevna Jarðargrunnin, sum lænir út til 4% í rentu. Hetta hevur ikki givið nakað ítøkiligt úrslit, so leingi flutningsspurningurin ikki er loystur.

Nú eru liðin 2 ár síðan fyriliggjandi uppskot varð felt á Føroya Løgtingi, og vit hava fingið okkurt vinnuskapandi tiltak úti á útoyggjum. Vit hava nú prógv fyri, at tað er stórur munur á ti, ið meirilutin í idnaðarnevndini hevur til niðurstøðu, og so veruleikin.

Tann eina fyritøkan hevur fingið lán úr Menningargrunninum, men til vanligar treytir, t.v.s. skal gjalda tað sama í rentu og avdrátt í um árið sum ein og hvør onnur. Harafturat skal fyritøkan gjalda stóran eykakostnað í farmagjaldi.

Eitt annað idnaðarvirki hevur als ongar sømdir fingið frá Menningargrunninum, men her hevur Føroya landsstýri helst av samvitskubiti játtað studning.

Vit kunnu verða samdir við meirilutanum í idnaðarnevndini um, at flutningurin til og frá virkinum er tann størsti trupulleikin. Tað er tí løgið, at Strandfaraskip Landsins kunnu gera avtalur við virkir á meginlandinum um flutning av vørum fyri bert brotspart av ti kostnaði, sum onnur virkir skulu gjalda. Her átti at kunnað fyriskipast soleiðis, at útoyggjaflutningur kom undir líknandi skipan, um nakar vilji var til tess.

Sum tað framgongur av frammanfyristandandi, hava tingmenn helst felt uppskot okkara í 1985 út frá skeivum fyritreytum.

Vit leggja tí uppskot okkara framaftur óbroytt í tí treysti, at tingmenn nú siggja í eyguni, at skulu vit varðveita hesar bygdir, er neyðugt at skapa inntøkur og livimøguleikar, soleiðis at fólkið ikki flytur burtur, men í staðin støðast og mennist í heimbygdini.

1. viðgerð 18. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 3. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 18. í sama mánaði beint í idnaðarnevndina.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Sverri Midjord og Henrik Old) tekur ikki undir við uppskotinum hjá Fólkaflokkinum og vísir til viðmerkingar sínar í álitinum í løgtingsmáli nr. 78/1984: Løgtingslóg til oyggjamenning.

Nevndi meiriluti vísir til, at orsøk er at vera varin við at hava tveir stovnar undir landinum, ið loysa somu uppgávu.

Idnaðarnevndin hevur havt fund við Menningargrunnin og hevur kannað møguleikarnar fyri, at reglugerðin hjá Menningargrunninum kann verða broytt í mun til tær uppgávur, eisini hetta lógaruppskot miðar ímóti at loysa, og hevur nevndin fingið skriv dagfest 6. apríl 1987 frá Menningargrunninum hesum viðvíkjandi. Fotoavrit av nevnda skrivi er viðlagt álitinum.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Sverri Midjord og Henrik Old) metir, at uppskotið frá Menningargrunninum til broyting av reglugerðini ikki til fulnar loysir teir spurningar, ið talan er um á útjaðaraøkinum, og setir sostatt fram so ljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at kanna fyriliggjandi mál og koma við uppskoti til loysn, herí eisini møgulig peningajáttan

Minnilutin (Olaf Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið, soleiðis sum tað er lagt fram.

Ein annar minniluti (Eilif Samuelsen) heldur, at við teimum heimildum, sum Idnaðargrunnurin og Menningargrunnurin hava, so kunnu hesir grunnar við smáum broytingum í reglugerð síni lúka tey krøv, sum uppskotið miðar ímóti. Minnilutin setir tí eingi uppskot fram.

2. viðgerð 14. apríl. Lógaruppskotið, § 1, fall við 5-0, og uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í nevndini fall við 15-0 atkvøðum.

Menningargrunnur Ídnaðarins

Føroya Løgting
Løgtingsins Ídnaðarnevnd
100 Tórshavn

6.4.1987

Vísandi til fund í løgtingsins ídnaðarnevnd hósdagin 2. apríl í ár viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 93/1986 — løgtingslóg um oyggjarmenningargrunn — verður hjálagt uppskot nevnd Menningargrunsins um broyting av reglugerð grunsins, soleiðis at hesar laga seg eftir umstøðunum í útjaðaraøkjunum.

Henda broyting er tó treytað av, at grunninum verða veittar 2-3 mió. kr. afturat teimum verandi 10 mió. kr. árliga yvir løgtingsfíggjarlógini.

Viðmerkt verður, at tað ikki er neyðugt við lógarbroyting, sum víst á omanfyri. Broyting av reglugerð grunsins skal bert góðkennast av landsstýrinum.

Við hávirðing
n.v.
Martin Djurhuus

Uppskot

til

broyting av viðtøkum Menningargruns Ídnaðarins:

Ískoyti til § 13:
12. stk. Umframt tann í 2. stk. nevndi studningur kann studningur veitast við upp til 15% av íløgukostnaðinum til stovnan av virkjum í útjaðaraøkjum, ella um ein flytur virkið frá meginøkinum til útjaðaraøki. Hesin studningur verður eftir 5 árum lagdur um til vanligt veðrættarlán, um viðkomandi virki eftir nevndu 5 ár og eftir metan nevnd Menningargrunsins hevur rentabilitet í rakstrinum. Skiftir virki eigara við sølu innan fyri ásettu 5 árini, fellur allur studningurin til gjaldingar beinanvegin. Grunnurin kann tó geva loyvi til, at studningurin verður yvirførdur til nýggju eigararnar.
13. stk. Lán sambært stk. 3 og 4, sum verða veitt til virki í útjaðaraøkinum, kunnu veitast við eini rentu, sum liggur 2% undir vanligu útlánsrentu grunsins.
14. stk. Studningurin kann veitast til flutning av virki og virkisgøgnum úr meginøkinum til útjaðaraøkini. Studningurin má ikki fara upp um 70% av flutningskostnaðinum.

15. stk. Nevnd grunsins avger í hvørjum einstøkum føri, hvat meinast við útjaðaraøki og meginøki.

Viðmerkingar:
Nevnd grunsins ásannar, at kappingarføri fyri virki í tí sokallaða útjaðaraøkinum er skert í mun til virki, sum liggja í meginøkinum, og verður úrslitið, at verkætlanir, sum annars líka væl kundu virkað í útjaðaraøkinum, verða lagdar í meginøkinum. Nevnd grunsins metir ti, at møguleikar eiga at verða givnir verkætlanum í útjaðaraøkjunum at fáa so ódýra fígging sum gjørligt. Eisini skal tað vera »lokkandi« fyri virki og verkætlanir í meginøkinum at fara út í útjaðaraøkini. Tað er ikki gjørligt at vísa á ávísar oyggjar ella bygdir, sum kunnu koma undir heitið útjaðaraøki. Tað má ti verða upp til nevnd Menningargrunsins at meta um, hvar ella hvørji hesi øki eru.

94 Áheitan á IRF um at bíða við at byggja brennistøð

Ár 1987, týsdagin 3. mars, legði Olaf Olsen, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á leiðsluna fyri Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin (IRF) um at steðga eina tíð við at fara undir bygging av nýggjari ruskbrennistøð, meðan upplýsingar fáast um, hvussu brennistøðin á Sandvikabjalla virkar, og um hon er før fyri at brenna eisini tað burturkastið, sum IRF hevur ábyrgdina av. Heitt verður eisini á IRF um at taka upp samráðingar við Tórshavnar kommunu um at brenna burturkastið fyri tær kommunur í IRF, sum hava áhuga fyri tí.

Viðmerkingar:

IRF varð stovnað við tí endamáli á skynsamiligan hátt at fáa beint fyri tí burturkasti, sum limakommununurnar hevdu vanligan ábyrgd av. Til hetta endamál var ætlanin at byggja eina brennistøð. Tórshavnar kommuna gjørdi av ikki at vera við í felagsskapinum, men í staðin byggja sína egnu brennistøð.

Av ymiskum orsøkum, sum IRF hevur lítla ávirkan hevur havt á, er uppgávan, sum IRF fekk at loysa, ikki loyst enn.

IRF fekk ikki álagt at byggja eina brennistøð, men at beina fyri burturkastinum, men náttúrligt var at fáa eina brennistøð í landinum, og tað má vera rætt at kanna, um hendan er nóg góð og nóg stór til at kláru eisini at brenna tað, sum IRF skal taka sær av. Tað tekur kanska eitt ella tvey ár at fáa tað at virka, og vísir tað seg, at hon nøktar tørvin eisini fyri IRF, má tað verða bæði betri og bíligari at nýta hana, sum er, og ikki byggja eina aftrat.

Tað vil tí eisini vera rætt, at IRF samráðist við Tórshavnar kommunu um at brenna burturkastið fyri tær kommunur, sum ynskja tað, meðan kanningin fer fram.

Spurningurin um endurnýtslu av burturkasti hevur eisini tikið seg upp, og rætt er at kanna hesi viðurskifti, áðrenn farið verður undir bygging av nýggjari stø, tí stórur møguleiki er fyri, at kapasiteturin við einari stø er nóg stórur.

Fólkaflokkurin leggur dent á, at IRF hevur lógligt byggiloyvi, og er áheitanin í uppskotinum tí beinleiðis til hesa felagsskap um at umhugsa støðuna av nýggjum í ljósinum av núverandi støðuni.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 3. mars 1987 og varð eftir fyrstu viðgerð 24. mars 1987 beint í umhvørvisnevndina.

Endamálið við uppskotinum er, at løgtingið skal heita á IRF um at bíða við at byggja brennistøð, meðan upplýsingar fáast til vega, hvussu brennistøðin á Sandvíkahjalla virkar, og herundir, um henda stø er før fyri at brenna alt tað burturkast, sum IRF í dag hevur ábyrgdina av. Eisini skal verða heitt á IRF um at taka upp samráðingar við Tórshavnar býráð um at brenna burturkastið fyri tær kommunur í IRF, sum hava áhuga fyri tí.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes og Johs. M. Olsen) skal generelt vísa til álitsítt í løgtingsmáli nr. 87/1986 um demokratiska avgerð viðvíkjandi brennistøð í Leirvík, og her skal meiriluti bert gera vart við fylgjandi:

Undir teimum fundum, sum umhvørvisnevndin hevur havt við umboð fyri IRF og Tórshavnar býráð, er tað klárt komið fyri dagin, at einki grundarlag er fyri uppskoti Fólkafloksins.

Umboðini fyri IRF hava heilt greitt boðað umhvørvisnevndini frá, at IRF ikki kann ganga áheitanini í uppskoti Fólkafloksins á møti.

Hin vegin hevur umboðið fyri Tórshavnar býráð avgjørt boðað umhvørvisnevndini frá, at Tórshavnar býráð ikki undir nøkrum umstøðum kann ganga inn í samráðingar av tí slagi, sum Fólkaflokkurin skjýtur upp í uppskoti sínum.

Støða Tórshavnar býráðs er hon, at ongar samráðingar verða við IRF um samstarv, fyrr enn IRF hevur fingið gongd á byggingina av sínari brenthistøð fyrst.

Partarnir, sum Fólkaflokkurin í uppskoti sínum vil hava løgtingið at heita á, hava sostatt frammanundan gjørt løgtingsins umhvørvisnevnd greitt, at teir als ikki fara at fylgja einari slíkari áheitan, og løgtingið hevur sambært meirilutans áskoðan onga heimild til at tvinga ein kommunalan felagsskap at akta eina løgtingsáheitan. Meirilutin heldur tí einki grundarlag vera fyri at samtykkja uppskot Fólkafloksins.

Út frá hesum setir meirilutin einki uppskot fram í løgtingsmáli nr. 94/1986.

Ein minniluti (Eliesar Arge) tekur undir við uppskoti Fólkafloksins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

2. viðgerð 14. apríl. Uppskotið til samtyktar fall við 7-0 atkvøðum.

95 Broyting í toll- og avgjaldsreglum fyri bilar við ABS-bremsuskipan

Ár 1987, týsdagin 3. mars legði Johs. M. Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting heitir á Føroya Landsstýri um at leggja fyri løgtingið broytingar í toll- og avgjaldsreglunum fyri akfør, sum føra við sær, at kostnaðurin fyri ABS-bremsuskipan ikki verður roknaður upp í toll- og avgjaldsgrundarlagið.

Viðmerkingar:

Í Føroyum, eins og í øðrum londum uttan um okkum, økist bilferðslan ár undan ári, og harvið eisini krevini til avvarðandi myndugleikar um ábøtur og nýgerð av veganetinum kring landið, fyri at ferðslutrygdin kann liggja á einum so høgum støði sum gjørligt.

Hóast alt tað, sum gjørt verður fyri at tryggja bilferðsluna á okkara veganeti, so mugu vit ásanna, at samstundis sum bilatalið økist, og ferðslan harvið gerst tættari á vegnum, hava vit fingið nógv fleiri deyðsvanlukkur í ferðsluni, umframt at øll tey, sum fáa mein, ofta fáa brek fyri alt lívið, av ferðsluvanlukkum, og er hetta ein sorgarleikur fyri tann, ið raktur verður, og tey, ið avvarða, herumframt verður alt samfelagið útsett fyri beinleiðis tapi.

Viðvíkjandi sjálvum akførunum, bæði størri og smærri, fara fram stórar broytingar, m.a. av tí framkomna teknikkinum, sum ger bilarnar betri og tryggari á nógvum økjum.

Millum annað bjóða nú alt fleiri bilverksmiðjur fram bilar sínar við tí sokallaðu ABS-bremsuskipanini sum eykaútgerð, summar enntá sum standardútgerð, orsakað av tí øktu framleiðslumongd av hesi skipan, sum hevur ført til, at ABS nú alsamt kann keypast bíligari og bíligari frá verksmiðjunum, har skipanin verður framleidd.

ABS er ein elektrónisk ella mekanisk útgerð, sum ikki loyvir hjóllæsing á bili, uttan mun til hvussu førið er — vátt ella turt, hált ella ikki.

Við ABS-bremsuskipanini kann ein og hvør óansað royndir bremsa akfarinum (persónbili, lastvogni, bussi e.ø.) yvir so stutt strekki sum yvirhøvur gjørligt, og stýra samstundis.

Higartil hevur omanfyri umrødda útgerð verið sera dýr at keypa, orsakað av at eingin ódýr framleiðsla hevur verið møgulig, og hevur hetta ivaleyst verið gjørt enn verri av høgari tollbyrðu. Fyri einum tveimum árum síðan kostaði ABS-skipanin umleið kr. 50.000,-, meðan hon ídag er komin niður á einar kr. 9.000,- frá ávísum bilseljara við verandi tollsatsum.

Tá talan er um ABS-bremsur, er tað av avgjørdum týdningi at nevna, at henda skipanin virkar til optimala bremsilongd, óansæð um førarin er skelkaður — t.d. um eitt barn loypur út fyri bilin. Í einum tílíkum føri vil fáur ella eingin bilførari klára at bremsa uttan hjóllæsing við vanligum bremsum.

Orsakað av, at umrødda bremiskipan til bilar av teimum sakkonu verður mett framúrskarandi góð fyri ferðslutrygdina, mælir Sambandsflokkurin til, at funnið verður fram til eina broyting í verandi tollskipan, sum fritekur ABS-bremsuskipanina fyri avgjøld til landskassan.

Ein mátin er, at loyvt verður at minka toll- og avgjaldsgrundarlagið við ávísum upphæddum, alt eftir um talan er um elektróniskar (tann besta) ella mekaniska ABS-bremsuskipan, og hvussu stórur bilurin er.

Út frá hesum verður sett fram hetta uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt 3. mars 1987 og við fyrstu viðgerð 6. mars sama ár beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið; við á fundi var Atli Jensen frá Bileftirlitinum.

Hann greiddi frá hesi nýggju bremsuskipan, hvussu hon virkaði, og helt, at hon var nógv betri enn tann vanliga nýtta.

Nevndin er samd um, at akfør eiga at hava so góða bremsuskipan sum møguligt.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Poul J. Olsen) beldur tað fara at vera ringt at umsita eina slíka lóg, um teir ymsu lutirnir á bilinum hava ymiskan toll, og kann sostatt ikki taka undir við uppskoti Sambandsfloksins.

Meirilutin mælir sostatt til, at málið verður sent landsstýrinum, og setir fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur í fyrstu syftu undir við uppskoti Sambandsfloksins og aðru syftu við uppskoti meirilutans.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsflokksins.

2. viðgerð 31. mars. Uppskotið til samtyktar frá Sambandsflokkinum fall við 11-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í skattanevndini varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

96 Løgtingslóg um dupultsporað berghol millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli

Ár 1987, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um dupultsporað berghol imillum Ánirnar, Árnafjørð og Depli.

lagtingslov om dobbeltbane tunnel mellem Ánirnar, Árnafjørð og Depli.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at skipa fyri gerð av dupultsporaðum bergholum imillum Ánirnar, Árnafjørð og Depli.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at lade udføre dobbeltbane tunnel imellem Ánirnar, Árnafjørð og Depli.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:
Tá núverandi bergihol norður um fjall á Borðoynni vórðu framd seinrapartin av sekstiárunum, var hetta einki minni enn eitt bragd politiskt, men so sanniliga eisini ein lívstreyt fyri menningina av bygdunum við Hvannasund og á Viðareiði.

Henda íløgan setti eisini sum ætlað gongd aftur á menningina á hesum plássum. Tað unga fólkið, sum áður hevði flutt til stórplássini, bygdi í staðin í heimbygdunum.

Eisini vinnulívsútbyggingin fór at bragda aftur. Men fáur mundi gruna ta stóru menning, sum okkara landi fór at verða fyri tey næstu árini, og nú smá 20 ár seinri mugu vit ásanna, at bergholini ikki lúka treytirnar fyri samferðslumynstrinum í dag. Skal økið eystan Múla ikki aftur falla afturút sum í fimti- og sekstiárunum, so er neyðugt at bøta um hesi samferðsluviðurskifti.

Menningin hesi 20 árini hevur ført við sær nógv økta ferðslu. Eisini akførini eru broytt nógv. Vit hava í dag eina rúgvu av bussum, lastbilum og kontainaraflutningi, sum als ikki sleppa ígjøgnum bergholini. Eisini hava vit akfør, sum sleppa ígjøgnum, men ongan møguleika hava at halda sína víkiskyldu, av tí at víkiplássini bæði eru ov stutt og ov lág.

Um tvey tílík akfør møtast inni í bergholunum, førir hetta til trafikkpropp, og annað av akførunum má bakka allan vegin út aftur, upp til 1,5 km. Hetta førir aftur við sær, at nógvir bilar verða uppi í hesum trafikkproppi, sum eisini økir nógv um vandan fyri forgassing.

Ferðslan í bergholinum er eisini stór. Til samanlíkning kann nevnast, at tað koyra eins nógvir bilar pr. dag ígjøgnum Borðoyarbergholini sum t.d. ígjøgnum Lorvíkarbergholið.

Fyri at hjálpa upp á henda vandan loyva vit okkum at seta fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsverkfrøðinginum beinanvegin at skipa fyri ljósregulering við Borðoyar-bergholini fyri akførum, sum ikki kunnu halda sína víkiskyldu.

Ein onnur stór samferðsluútbygging, sum í løtuni fer fram í Norðoyggjum, er brúgv um Haraldssund.

Samgongan hevur samtykt, at gerast skal brúgv við siglingarrennu. Eisini hevur samgongan lovað útróðrarfelagnum í Klaksvík, at Haraldssund skal verða opið aftur fyri sigling skjótast gjørligt. Vit í andstøðuni eru ikki vitandi um, hvat projekt verður framt, men ganga vit út frá eini brúgv, sum liggur 17 m

yvir havinum (tað sama sum norðuri við Streymin), so skulu nýtast uml. 350.000 m³ av ífyllu, harav ca. 150.000 m³ eru lagdir í dag.

Tað verða soleiðis uml. 200.000 m³. Hetta grót skal so fáast til vega onkurs-vegna.

Eitt dupultsporað berghol hevur eina rúmd upp á uml. 50 m³. Vit kunnu soleiðis spreingja umleið 3.000 m fyri at fáa ta grótfyllu, sum skal nýtast í Haraldssundi.

Uppskot okkara er soleiðis orðað, at vit ikki hava tikið støðu til, hvar eitt nýtt berghol skal leggjast, ella um núverandi berghol skulu víðkast.

Tað er tó okkara meining, at tað neyvan letur seg gera at víðka verandi berghol av fleiri orsøkum sum t.d.

1. ógjørligt at halda ferðslumøguleikarnar opnar, meðan arbeitt verður,
2. trygdarviðurskiftini,
3. telefonkaðalar sum liggja ígjøgnum í dag.

Harafturat er ivasamt, hvat verður meira kostnaðarkrevjandi, tá samanum kemur. Vit hava heldur ikki sett á nakra tíðarætlan, nær arbeiðið verður framt. Vit vita, at samgongan hevur eina ætlan fyri hesum valskeiði, men tá hetta uppskotið er tengt afturat brúgv um Haraldssund, sum samgongan hevur bundið seg til at fremja í hesum valskeiðinum, halda vit, at vit kundu fingið tvær kostnaðarmiklar íløgur fyri nærum sama pening.

1. viðgerð 18. mars. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 5. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 18. mars beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið, og hevur fundur verið við landsverkfrøðingin.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Asbjørn Joensen, Tórálvur Mohr Olsen og Heini O. Heinesen) vísir á, at landsverkfrøðingurin hevur upplýst, at í løtuni verða kanningar gjørdar viðvíkjandi bergholunum í Norðoyggjum, og verða kanningarnar lidnar í 1987. Sami meiriluti vísir á ta raðfesting av bergholsgerðum, ið verandi samgongumeiriluti hevur avtalað. Víðari verður vist til álit í løgtingsmáli nr. 62/1984.

Hesi viðurskifti tekur meirilutin til eftirtektar og setir einki uppskot fram.

Viðvíkjandi skipan av ljósregulering við Borðoyarbergholini er meirilutin av tí áskoðan, at tað er neyðugt, at landsverkfrøðingurin beinanvegin setir í verk tørvskanningar um ljósreguleringar yvirhøvur og tekur neyðug stig í hesum spurningi.

Sostatt setir samd nevnd fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at biðja landsverkfrøðingin um alt fyri eitt at seta í verk tørvskanningar og at útvega uppskot um, hvussu trupul ferðsluviðurskifti í bergholum kunnu loysast.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen og Eyðun Viderø) mælir til at samtykkja uppskot Fólkaflokksins.

Minnilutin (Johs. M. Olsen) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til støðu sína í løgtingsmáli nr. 84/1986 viðvíkjandi framtíðar útbygging av landsvegakervinum og metir, at støðan í Norðoyggjum sbrt. løgtingsmáli nr. 96/1986 viðvíkjandi vega- og tunnilsgerð eigur at verða tikin til viðgerðar av avvarðandi myndugleikum og setir tí fram

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at gera skitsuprojekt og kostnaðarætlan av vegakervinum á Borðoynni og at leggja kanningarúrslitið fyri løgtingið skjótast gjørligt og í seinasta lagi við árslok.

2. viðgerð 9. apríl. Uppskotið til samtyktar frá Fólkaflokkinum fall við 15-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í samferðslunevndini varð samtykt við 25-0 atkvøðum, og uppskot minnilutans fall við 10-0 atkvøðum.

97 Uppskot til samtyktar viðvíkjandi bergholi til Gásadals

Ár 1987, hósdagin 5. mars, legði Svend Aage Ellefsen, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum alt í einum at fara undir bergholið til Gásadals.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt var ætlanin hjá undanfarnu samgongu, at amboðini, ið nýtt vóru til bergholsarbeiðið á Kalsoynni, skuldu flytast beinleiðis vestur í Vágar, tá arbeiðið á Kalsoynni varð lokið, fyri har at verða nýtt til Gásadalsbergholið.

Soleiðis kom ikki at verða, av tí at sitandi samgonga avráddi heldur at taka upp boriarbeiði á Kunoynni í staðin.

Nýggj boriútgerð er keypt til Sumbiarbergholið, soleiðis at hvørki tann fullfíggjaða boriútgerðin, sum í meira enn eitt ár hevur staðið á landsfjósinum í Kollafirði, ella tann, sum nýtt hevur verið í Norðoyggjum, koma at verða nýttar í Suðuroynni.

Tvey sett av boritólum standa sostatt ónýtt í landinum. Kortini frættist einki um, nær byrjað verður at bora til Gásadals, hóast Gásadalur er einasta bygd í Føroyum uttan annað samband við umheimin enn Snípuna, og hóast Gásadalsbergholið er tað stytsta av teimum bergholum, sum seinastu tíðina hava verið umrødd við tað, at tað bert er 1,7 km langt.

Undirritaði setti avvarðandi landsstýrismanni fyrispurning í januar mánað málinum viðvíkjandi, men enn er so einki svar komið. Tað verður í hesum døgum mangan tosað um ov stórt íløguvirksemi kring landið, men í Vágum hevur ikki í langar tíðir verið so vánaligt sum hesi hæði seinastu árini, so eisini í so máta hevði hetta arbeiðið komið væl við. Náttúrliga átti Gásadalsbergholið at verið tað fyrsta, sum farið varð undir í hesum valskeiðinum, klárt sum tað var at bora, so tað er við vón um góða undirtøku, at vit í Fólkaflokkinum leggja uppskotið fyri løgtingið. Peningurin til arbeiðið verður tikin av konto § 13,6 á fíggjarløgtingslógini.

1. viðgerð 18. mars. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum 5. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 18. mars s.á. beint í samferðslunevndina.

Í uppskotinum verður mælt til, at farið verður alt fyri eitt undir bergholsgerð til Gásadals.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tordur Niclasen, Tórálvur M. Olsen, Asbjørn Joensen og Heini O. Heinesen) vísir á, at sambært teirri ætlan, samgongan hevur lagt viðvíkjandi bergholsgerð, verður farið undir bergholið til Gásadals á vári 1988.

Sostatt tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen, Eyðun Viderø og Johs. M. Olsen) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at tað verður samtykt.

2. viðgerð 9. apríl. Uppskotið til samtyktar frá Fólkaflokkinum fall við 7-0 atkvøðum.

98 Lóg um avtøku av lóg um Føroya Gjaldstovu

Ár 1987, týsdagin 24. mars, legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av lóg um Føroya Gjaldstovu.

§ 1.

Lóg nr. 12 frá 28. mars 1949 um Føroya Gjaldstovu verður sett úr gildi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Lagtingslov om ophævelse af lov om Færøernes Oppebørselskontor.

§ 1.

Lov nr. 12 af 28. marts 1949 om Færøernes Oppebørselskontor ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur samtykt at taka stig til at gera broytingar í arbeiðsbýtinum á Føroya Gjaldstovu, soleiðis at tollumsitingin verður skipað sum sjálvstøðug deild.

Í lógini um Føroya Gjaldstovu eru upproknað, hvørji arbeiðsøki liggja undir gjaldstovuni.

Hildið verður ikki, at tað er neyðugt við serligari lóg fyri ávísa fyrisiting undir landsstýrinum. Tessvegna verður skotið upp at avtaka lógina, soleiðis at landsstýrið eins og á øðrum økjum innan fyrisitingina kann skipa fyri hesum á skynsamiligan hátt.

1. viðgerð 26. mars. Málið vard beint í fíggjarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið vard lagt fram av landsstýrinum tann 24. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 26 í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minni luta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Jacnsen, Tordur Niclasen, Signar Hansen og Anfinn Kallsberg) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) eru av teirri áskoðan, at eingin orsøk er til at avtaka lógina sum so, og eru av teirri uppfatan, at í § 1 gongur 3. punktum út.

Sostatt setir nevndi minniluti fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í løgtingslóg nr. 12 frá 28. mars 1949 um Føroya Gjaldstovu, § 1, verður pkt. 3 strikað.	I lagtingslov nr. 12 af 28. marts 1949 om Færøernes Oppebørselskontor, § 1, udgår pkt. 3.

2. viðgerð 9. apríl. § 1 varð samtykt við 20-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð, varð samtykt við 20-0. Broytingaruppskot frá minnilutanum í figgjarnevndini fall við 6-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. apríl. Málið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 303 28. Lóg nr. 32 frá 30. apríl 1987.

99 Broyting í tinglýsingarlógini

Ár 1987, hósdagin 5. mars, legdi Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tinglýsing.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing við seinni broytingum verður aftan á § 47 b sett nýggj grein:

»§ *47 c.* Hóast reglurnar í § 37 og § 47 b í hesi lóg kunnu tey, ið reka alivinnu við loyvi frá landsstýrinum, geva undirveð í alifiski og smolti fyri skuld, sum stavar frá rakstri av alistøð ella smoltstøð.

2. stk. Veðbrøv, sum geva undirveð í alifiski ella smolti, verða strikað, tá ið 3 ár eru liðin síðan tinglýsing pantibrævsins, og tað ikki innanfyri hesa freist er meldað tinglýsing av nýggjum.«

lagtingslov om ændring i tinglysningsloven.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 55 af 16. august 1962 om tinglysning med senere ændringer indsættes efter § 47 b som ny paragraf:

»§ *47 c.* Uanset bestemmelserne i § 37 og § 47 b i denne lov kan de, der driver fiskeopdræt med tilladelse fra landsstyret, give underpant i opdrætsfisk og fiskeyngel for gæld, der stammer fra driften af opdrætsanlæg eller yngleanlæg.

Stk. 2. Pantebreve, der giver underpant i opdrætsfisk eller fiskeyngel, udslettes, når der er forløbet 3 år efter pantebrevets tinglysning, og der ikke inden denne frists udløb er anmeldt fornyet tinglysning.«

§ *2.*

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Raksturin av alibrúkunum krevur stóran rakstrarpening, við tað at tað ganga umleið 2 ár frá tí, at smoltið verður slept út, til fiskurin kann seljast.

Sjálv alistøðin (ringar v.m.) kann figgjast við undirveði í ringunum eftir reglunum um veð í leysafæ.

Fiskurin í alifiringunum kann tó ikki veðsetast sum trygd fyri rakstrarláninum, við tað at fiskurin kemur undir reglurnar í § 17 h í tinglýsingarlógini um, at veð í leysafæ ikki kann veitast í søvnum av eins ella til fólags nýtslu av ætlaðum lutum, ið nevndir verða við vanligum heitum, uttan so at annað fylgir av øðrum lógarreglum.

Somu trupulleikar við rakstrarfiggingini hava smoltstøðirnar á landi. Sjálv stoðin verður figgjað við veði í føstu ognini, meðan eingin møguleiki er at fáa nakað veð í smoltinum sum trygd fyri veittum rakstrarláni.

Fyri at gera tað møguligt hjá lánsstovnunum at figgja raksturin av alivinnuni móti trygd í alifiski og smolti, hevur landsstýrið kannað møguleikarnar fyri eini skipan, ið kann veita veð í fiskinum nøkunlunda á sama hátt sum við veð í veiðu.

Heimildin til veð í veiðu finst í lóg nr. 328 frá 2. november 1962, sum er ein rikislóg, men hevur landsstýrið frá løgmálaráðnum fingið at vita, at heimild til veðseting av alifiski kann fremjast við eini broyting í løgtingslógini um tinglýsing.

Sorinskrivarin, ið umsitur tinglýsingarskipanina, hevur einki at viðmerkja til hesa broyting í tinglýsingarlógini.

1. viðgerð 10. mars. Málið varð uttan orðaskifti beint í ídnaðarnevndina, sum 3. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 5. mars 1987 og eftir 1. viðgerð beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 25-0, § 2 samtykt við 26-0. Við 26-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. apríl. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 524-1. Lóg nr. 39 frá 5. mai 1987.

100 Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum

Ár 1987, miðvikudagin 18. mars, legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um demokratisering av sjónvarpsmonopolinum.

§ *1.* Løgtingið velur 9-manna nevnd av sakkønum at kanna og skriva álit um verkætlan til at demokratisera sjónvarpsmonopolið.

§ *2.* Álit nevndarinnar verður tøkt so skjótt, at landsstýrið kann leggja løgaruppskot fyri tingið í tráð við hesa lóg og eftir tilráðing nevndarinnar á ólavsøku komandi.

§ *3.* Nevndin verður mannað, so hon umboðar sakkunnleika um fjølmiðlar, tekniskt og innihaldsligt, mentan, trúarliv, búskap og løgfrøði, og verður vald eftir vanligum løgtingslutfalsvali.

§ *4.* Arbeiðssetningur nevndarinnar er at finna fram til bestu og biligastu sjónvarpsskipan eftir entreprisumodellinum við einum sendineti sum nú, og við einum øðrum óheftum SV-2 sendineti, og frægasta fíggingarloysn í báðum førum, eisini møguligu lýsingarinntøkum.

lagtingslov om demokratisering af tv-monopolet.

§ *1.* Lagtinget vælger et udvalg på 9 medlemmer af sagkyndige at undersøge og skrive en betænkning om et program til demokratisering af tv-monopolet.

§ *2.* Udvalgets betænkning skal foreligge så betids, at landsstyret kan lægge lovforslag for tinget i overensstemmelse med denne lov og i henhold til udvalgets indstilling kommende olaj.

§ *3.* Udvalget sammensættes således, at det repræsenterer sagkyndige for massemedierne teknisk og ved sin sammensætning iøvrigt, kultur, religion, økonomi og juridisk. Udvalget vælges efter lagtingets regler om forholdstalvalg.

§ *4.* Udvalgets kommisorium er at finde frem til den bedste og billigste tv-ordning eller et entreprisemodel med et sendenet som nu, og med et andet uafhængigt tv-2 sendenet, og med den bedste økonomiske løsning i begge tilfælde ogsa med mulige reklameindtægter.

§ 5. Sjónvarpsgrunnurin ber útreiðslurnar, upp til 500.000 kr., ið standast av nevndararbeiðinum.

§ 5. TV-fondet afholder udgifterne indtil 500.000 kr. til udvalgsarbejdet.

§ 6. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Framleiðsluorkan og -háttur hjá SvF eru avmarkað, og maktar stovnurin ikki at kappast í undirhaldi við sjónbandaíðnaðin longu nú. Hvaðna verri verður, tá tað longu í ár ber til at taka tónleika-, films-, ítróttar-, undirhalds- og útlendskar tíðindasendingar niður frá 6 satelittum. Fylgisveinarnir fjølgast í stórum komandi árini.

SvF arbeiðir undir trongum korum og við lítlari manning, men hevur gott sendinet og sendaraútgerð at ráða yvir. Hesum okkara nýggja tíðindamonopoli gongst rættiliga væl at gera føroyskar tíðindasendingar og so tær breiðaru og djúparu sendingurnar um aktuell ella áhugaverd føroysk evni.

Eyðvitað er, at uttan mun til, hvussu nógv stovnurin verður útbygdur í verandi líki sum monopol, dragna vit sum frá líður longur og longur afturút á hesum týðandi upplýsingarøki.

Í grannalondum okkara víðka tey útboðið av landsumfatandi og lokalum senditilfari við at gera tað møguligt hjá fleiri áhugabólkum, feløgum og samtøkum av einstaklingum at framleiða og sjónvarpa egið upplýsingartilfar. Sumstaðni verður hetta gjørt við sonevndum SV-2, ið eru sjálvstøðug sendinet óheft av statsmonopolinum. Aðrastaðni royna tey at brúka tíðindamonopolið sum varpara av sendingum, sum onnur feløg enn starvsfólkini á almenna SV-monopolinum framleiða.

Um tíðindaflutningur og upplýsing í Føroyum skuldu lokið vanlig demokratisk krøv um pressufrælsi, áttu bert tekniskar forðingar at darva fríari upplýsing og eingin monopollóggáva at vart einstakan stovn við framíhjárætti, meðan øll onnur einki pressufrælsi hava orsakað av skerjingum á hesi náttúrligt ófjøtraða virkisøki í einum fríum landi.

Men sum ikki eina ferð hevur tøknifrøðin í fríu vesturheiminum gjørt henda pressueinkarrætt ótíðarhóskandi. Hesi sannroynd ber til at laga seg eftir við hesum lógaruppskoti, sum fríger SV-framleiðslurættin.

Eitt føroyskt SV-2 krevur nýggja sendaraútgerð á fjøllunum fyri millum 5 og 10 mió. kr.

Men ein loyvisskipan innan karmarnar hjá SvF, sum byggir á entreprisu modellið, kann fáast í lag uttan eykakostnað í útgerð.

Tað eigur sostatt at vera loyvt feløgum, sum eru stovnað bert við framleiðslu av SV-sendingum fyri eyga, at leiga sær fastar tíðir, nakrar tímar um mánaðin,

inn á sendinetið hjá SvF við egnum sendingum. Á henda hátt kundu lokalu sjónvarpsfeløgini, sum enn eiga útbúnað, fæ og serkønt fólk, sent nakrar tímar ialt hvørja viku.

Tey SV-studii, sum eru í landinum, men sum ikki hava havt loyvi til at nýta kunnleika og útgerð almennt, kundu verið við til at framleiða eftir umbøn, sáttmála ella leysari avtalu.

Hvør senditími hjá SvF kostar sum er um 5.000 kr. Umroknað til føroyskar og føroyskaðar sendingar kostar hvør tími um 10.000 kr., meðan hvør føroyskt framleiddur senditími kostar 20.000 kr.

Sostatt eru útreiðslurnar til føroyskt senditilfar stórar sum er, og hevði ein loyvisskipan eftir entreprisumodellinum neyvan kostað meir um tíman enn hin verandi.

Annars eigur nevndin at kanna møguleikan fyri lýsingaiuntøkum, SvF ella eitt av tí óheft studioverkstað kundi tikið upp á seg at framleiða lýsingar til at fíggja sendingar við, ella kundi hvør einstakur loyvishavari av senditíð útvegað sær egnar lýsingarinntøkur, tó so at lýsingar bert fáa innivist í blokkum ávist minutttal fyri hvønn senditíma.

Lond, sum hava roynt skipan við lýsingarfígging av sjónvarpi, kunnu prógva, at sjónvarpslýsingarnar ikki koma upp um 20% av samlaða lýsingarumsetninginum í landinum, bert brotpartur av tí, ið avísir og serliga fakblað lýsa fyri.

Umframt at lata loyvishavarum studio og sendinet kann SvF framleiða egnar tíðindasendingar eins og nú so ofta um vikuna, sum myndugleikar, nevnd og leiðsla halda vera rímiligt, kanska sum nú upp í fjórðing av samlaðu senditíðini.

Sjónvarpsnevndin eigur at hava sum uppgávu at viðgera umsóknir um sendiloyvi, ið kann veitast feløgum t.d. upp til 3 ár. Sendiloyvi, ið ikki verður brúkt, ið verður misnýtt ímóti vanligari pressulóg, kann takast frá loyvishavara. Sendingar eiga at lúka vanlig krøv eftir pressulógini, og framleiðarin eigur at goyma hvørja sending í ávíst tíðarskeið, eftir at hon er send.

Í almennum gildi kann skoytast uppí, at tað í dag er dýrari at útvega fullfíggjaða framleiðsluútgerð til eina avís enn til eitt sjónvarpsverkstað. Postverkið tryggjar útbering av føroysku bløðunum. Telefonverkið kundi hóskandi tikið upp á seg tekniskt og fíggjarliga at tryggjað sendinetið til framtíðar føroyskt sjónvarp eftir entreprisuskipanini.

Tekniskt liggur leiðin víðopin fyri, at stórar skapandi kreftir verða loystar í føroyska samfelagnum til framleiðslu av sjónvarpssendingum. Grundreglan eigur at vera, at bert tekniskar avmarkingar forða fyri, at hesar skapandi kreftir sleppa at virka frítt, og er núverandi darvandi einkarrættur í stríð við grundlóg og viðurkendan mannarætt.

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í mentanar- og skúlanevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 18. mars 1987 og varð eftir 1. viðgerð beint í mentanar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) vísir á, at landsstýrið í løtuni hevur allan framtíðar bygnaðin hjá útvarpi og sjónvarpi til umhugsanar.

Meirilutin heldur tí onga orsøk vera at gera broytingar í lógini um Sjónvarp Føroya nú og setir tí einki uppskot fram.

Ein minniluti (Óli Breckmann) mælir til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Eilif Samuelsen) tekur í høvuðsheitinum undir við uppskotinum um at avmonopolisera sjónvarpið, og at sett verður ein nevnd, sum skal arbeiða við m.a. at decentralisera framleiðsluna av sjónvarpspgrogrammum.

Vart verður gjørt við, at torført fer at vera at velja nevndina eftir teimum sjónarmiðum, ið nevnd eru í § 3.

2. viðgerð 9. apríl. § 1 fall við 12-0 atkvøðum. Málið sostatt burturdottið.

101 Endurgjald til familjur, ið vilja passa egin børn

Ár 1987, mikudagin 18. mars, legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	*lagtingslov om ændringer i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.*
§ *1.* Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður gjørd hendan broyting:	§ *1.* I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændring:

§ 2 verður soljóðandi:

»§ 2. Fyri hvørt barnið, sum ikki er 16 ár í byrjanini av tí álmanakkaári, sum skattur er ásettur, verður í útroknaða landsskattinum sambært § 1 í hesari lóg hjá teimum skattskyldugu eftir § 1, nr. 1-6 í samtíðarskattalógini, drignar 1.800 kr. frá sbrt. § 46, 3. stk. í somu lóg. Fyri hjún er frádrátturin fyri hvørt barnið, sum er undir 7 ár í byrjanini av tí álmanakkaári, sum skattur verður lagdur á, kr. 15.000,-, um annar av hjúnafeløgunum arbeiðir heima og ikki í skattaárinum hevur havt skattskylduga inntøku. Í hjúnalag verður frádrátturin í skattinum hjá manninum. Um hesin ikki fær nýtt frádráttin til fulnar, skal restin verða drigin frá í skattinum hjá móðurini, um hon er sett í skatt sambært § 4, 2. stk. í samtíðarskattalógini. Við barn meinast hjúnabandsbarn, barn uttan hjúnaband, tá ið móðirin er skattgjaldarin, stjúkbarn, ættleitt barn ella fosturbarn, sum ikki er latið støðugt fosturviðurlag fyri. Er barnafrádrátturin hægri enn skatturin uttan barnafrádrátt, verður munurin útgoldin avvarðandi skattgjaldara. Føroya Gjaldstova rindar peningin í oktober mánaði.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2 formuleres således:

»§ 2. For hvert barn, som i begyndelsen af det kalenderår, for hvilket skatten udskrives, er under 16 år, gives der i de i kildeskatteloven § 1, nr. 1-6 nævnte skattepligtige personer et fradrag på 1.800 kr. i den i henhold til § 1 i denne lov beregnede skat. For ægtefæller er fradraget for hvert barn, som er under 7 år i begyndelsen af det kalenderår, i hvilket skatten pålægges, kr. 15.000,-, hvis en af ægtefællerne arbejder hjemme og ikke har haft skattepligtig indtægt i skatteåret. Ægtemanden oppebærer fradraget. Hvis denne ikke kan udnytte fradraget fuldt ud, bliver resten at fradrage hos moderen, hvis denne er ansat til skat ifølge § 4, stk. 2, i kildeskatteloven. Ved barn forstås ægtebarn, barn uden for ægteskab, når moderen er skattepligtig, stedbarn, adoptivbarn eller plejebarn, for hvis pleje der ikke ydes vedvarende vederlag. Er børnefradraget større end skatten uden børnefradrag, udbetales differencen til den pågældende skatteborger. Føroya Gjaldstova udbetaler beløbet i oktober måned.«

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Uppskotið miðar móti:

1. at styðja fíggjarliga grundarlagið undir familjuni,
2. at lætta trýstið á verandi barnaansingarstovnar,

3. at minka um tørvin eftir nýggjum stovnsplássum og
4. at tryggja meiri rættvísi, javnrætt og ikki minst størri valfrælsi hjá foreldrum at nýta verandi og komandi dagrøktarpláss.

Stívliga 700 vøggustovu-, barnagarðs- og dagrøktarpláss eru í Klaksvík, Runavík, Tórshavn og á Argjum. Fleiri kommunur hava í kvittanum at útvega sínum borgarum ansingarpláss. Gravgangurin eftir plássum er stórur og verður tað uttan iva langt fram. Pláss verður biðið, áðrenn barnið er føtt. Bert tey fægstu fáa pláss.

Nú hevur Tórshavnar býráð gjørt bol í sjógv við at slóða nýggjar leiðir við serligari og umfatandi barnaansingarskipan fyri høvuðsstaðin.

Hetta megnartiltak, sum ger stóra undirtøku frá foreldrum og skattgjaldarum, eigur tó ikki at útiloka, at løgtingið kann gera sítt til at økja um valfrælsið hjá familjum við smærri børnum, sum figgjarliga kosta bæði teimum og samfelagnum pening at ansa, antin ansingin fer fram í heiminum ella uttan fyri heimið.

Talið á børnum millum 0 og 6 ár í Føroyum liggur nú um 5.000 falt, so almenna barnaansingin uttan fyri heimið rekkur bert einum barni av sjey, meðan 85% av føroysku børnunum framvegis slíta sínar barnaskógvar inni hjá foreldrunum.

Nýggja skipanin í Havn bøtir nakað væl um tilboðið á ansing.

Frá sakkønari síðu verður upplýst, at eitt vøggustovupláss kostar í meðal um 65.000 kr., eitt barnagarðspláss um 40.000 kr. og eitt privat ansingarheim nakað minni í rakstri árliga. Samanlagt kostar eitt barn uttan fyri heimið sostatt í meðal einar 50.000 kr. árliga.

Hesin kostnaður verður býttur nakað soleiðis: 40% danski staturin, 30% kommunan og 30% (stundum minni) foreldrini. Landskassin rindar einki. Men kortini viðkemur hesin spurningur løgtinginum, sum eftir røttum átti at rindað statsins part.

Verandi barnaansingarskipan við higartil bert 700 plássum gevur teim fáu foreldrum, sum eru so heppin at fáa pláss fyri sínum børnum, 30.000 kr. árliga í barnaansingarstuðli pr. barn, umframt at skipanin loysir bæði foreldrini frá heiminum í dagtímunum til lønta inntøku.

Hin vegin eru figgjarligu skyldurnar hjá ungum hjúnum við børnum og nýggjum húsum, serliga tá skatturin kemur omaná, so stórar, at bæði foreldrini verða tvingað út at arbeiða, antin tey vilja tað ella heldur kundu hugsað sær, at annað varð heima, meðan børnini eru smá.

Hetta lógaruppskot kundi gjørt sítt til at bøtt um valfrælsið hjá øllum barnaforeldrum, so tey sleppa at velja — leyst av figgjarligum áneyðum uttanifrá — um bæði hjúnini vilja arbeiða úti uttan hendan cyka barnafrádrátt, ella um annað teirra vil vera heima hjá smábørnum og so fáa fyrimun av frádráttinum upp á 15.000 kr. pr. barn.

Tann logiska fylgjan av tí higartil førda barnaansingarpolitikkinum er vael, at øll børn millum 0 og 6 ár fáa stovnspláss við tíðini, um øll foreldur skulu hava

sama rætt til alment ansingarpláss til síni børn. Men henda altumfatandi almenna barnaansingin hevði kostað 5.000 (børn) x 50.000 kr. (pr. stovnspláss) ella tilsamans upp ímóti 250 milj. kr. árliga í rakstri — umframt bygningsíløgur. So hvørt sum talið á stovnspláss um ekist, herðist kostnaðurtrýstið á allar skattgjaldarar, eisini tey foreldur, sum til eina og hvørja tíð ikki enn hava útvegað sínum børnum stovnspláss.

Uppskotið miðar móti at lætta skattliga trýstið á eina vanliga inntøku, at hon verður nokk hjá eini familju at klára seg við, um annað av hjúnunum vil arbeiða í heiminum, meðan børnini eru smá.

Talið á børnum, eini hjún ynskja sær, eigur í minst møguligan mun at vera fíggjarliga treytað.

Uppskotið hevði skorið eftirspurningin eftir verandi barnaansingarplássum niður og minkað um tørvin á nýggjum plássum tilsvarandi.

Viðari ber tað í sær, at føroyski tørvurin á donskum peningaveitingum til hetta endamál minkar.

Valfrælsið í hesum uppskoti stuðlar trivnaðin hjá kjarnufamiljuni, sum er grundstøðið undir samfelag okkara.

Tilsamans hevur landskassin um 20 mió. kr. í minniinntøku árliga av hesum uppskoti, um tað fevnir stívliga 2.500 børn. Roknast kann við, at helmingurin av føroyskum foreldrum høvdu valt at passa egin børn. Sum er kostar barnaansingin í Føroyum 30 mió. kr. árliga tilsamans og fevnir bert 700 børn. Ein minniinntøka er ikki hitt sama sum ein meirnýtsla.

Sammett við, at hvørt barn á ansingarstovni kostar foreldrum 12.000 kr. og tí almenna 38.000 kr. árliga í rakstri, er hesin eyka barnafrádráttur í landsskatti upp á 13.200 kr. til hjún við einari inntøku væl spardur peningur hjá tí almenna, sum also rindar 3 ferðir so nógv pr. dagstovnarpláss í sín part, sum hesin eyka barnafrádráttur til tey foreldur at børnum millum 0 og 6 ár, ið ikki brúka almenna barnaansing, kostar.

Førir hetta uppskot til, at tað ikki longur verður fíggjarlig vanskepna hjá ungum hjúnum við nýggjum húsum at fáa børn, stendst eisini samfelagsligt gagn av hesi lógarbroyting. Føroyum tørvar eitt økt barnatal í longdini, tí fráflytingin verður altíð stór frá einum oyggjasamfelag, og demografiska gongdin økir talið á fólki í útbúgving og á pensjónistum í mun til talið á fólki í vinnuførum árum. Økt barnatal hevði byrgt upp fyri hesi hóttan móti vælferðini. Vælferðin er jú treytað av, at nóg nógv eru, sum kunnu gjalda fyri tey, sum ikki makta sjálv.

Um foreldur sleppa at velja, antin bæði ella bert annað arbeiðir úti, meðan børnini eru smá, ger hetta uppskot sítt til, at úthoðið av arbeiðsplássum veksur í mun tíl eftirspurning. at fleiri ung sleppa í arbeiði har, sum nú barnaforeldur av skattatrýsti og fíggjarávum eru tvingað til at arbeiða, og at føroyski arbeiðsmarknaðurin verður meiri liðiligur.

1. viðgerð 31. mars. Málið vard beint í skattanevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av fólkaflokkinum 18. mars 1986 og eftir 1. viðgerð 31. í s.m. heint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen, Agnar Nielsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við uppskotinum, men visir til løgtingsmál nr. 134/1986: Løgtingslóg um barnastyrk.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskoti Fólkafloksins og mælir til, at tað verður samtykt.

10. apríl 2. viðgerð. § 1 fall við 7-0 atkvøðum. Málið sostatt burturdottið.

102 Broyting í útvarpslógini

Ár 1987, mikudagin 18. mars, legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarp

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp verður § 3, 1. stk. orðað soljóðandi:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om radio.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 23 af 28. marts 1956 om radio affattes § 3, stk. 1 således:

»Til útvarpið skal hvort húsarhald rinda gjald fyri ein radiomóttakara. Sama er galdandi fyri virki, skip, handlar, skrivstovur o.t. Fyri móttakarar í bilum og bátum undir 5 br. reg. tons verður einki gjald at rinda.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1986.

»Til radioen skal hver husholdning svare afgift for en radiomodtager. Det samme er gældende for virksomheder, skibe, forretninger, kontorer o.l. For modtagere i biler og både under 5 br. reg. tons svares ingen afgift.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1986.

Viðmerkingar:

Lógaruppskotið hevur til endamáls at beina burtur skeivleikar í verandi lóg um útvarpsgjald, sum ikki verður fylgd.

Sum tíðindamonopol hevur Útvarp Føroya m.a. framihjáratt teins og Sjónvarp Føroya), at lógin heimilar stovninum at krevja og panta eftir lurtaragjaldi av hvørjum einasta radiotóli í landinum.

Radiohandlar hava skyldu at boða Útvarpi Føroya frá, hvørja ferð eitt móttøkutól verður selt. Í øllum landinum munnu finnast tiggjutúsundtals radiotól, sum eftir galdandi lóg øll eiga at bera hvør sítt lurtaragjald.

Neyvan ger Útvarp Føroya brúk av politi- og dómsvaldi, uttan so at onkur heilt sýtir at gjalda sítt eina útvarpsgjald. Sostatt gongur Útvarp Føroya ikki eftir bókstavinum í lógini, og túsundtals radiotól sleppa undan at bera lurtaragjald.

Útvarp Føroya hevur farnu 10 árini fingið millum helming og ¾ av samlaðu inntøkum stovnsins frá lurtaragjaldinum (t.d. 1,6 av tilsamans 3,4 mió. kr. í 1976/77 og 12,6 av tilsamans 18,2 mió. kr. í 1986). Helst verður hvørki býti stórvegis broytt ella samlaða inntøka tíðindamonopolsins skerd av hesum uppskoti.

Lurtaragjaldsinntøka Útvarpsins í fjør lá um 12,6 mió. kr. svarandi til um 16.000 radiotól á 700 kr. í gjaldi hvørt. Í Føroyum eru eini 15.000 húsarhald og einar 1300 krambúðir, virki og skrivstovur, sum Útvarp Føroya fær inntøku frá gjøgnum lurtaragjaldið.

Nógv eru tó tey, sum fáa bæði tvey og trý uppkrøv, so antin sleppa summi sær undan at gjalda fyri tað eina, og/ella gjalda onnur fyri meira enn eitt radiotól.

Hetta lógaruppskot miðar móti at broyta verandi lóg um útvarpsgjald, so lógin samsvarar betur veruleikanum, nevniliga at hvørt húski rindar eitt lurtaragjald í staðin fyri at verða kravt eftir einum gjaldi fyri hvørt radiotól, leyst og fast, stórt og lítið, við hús ella í bilinum.

Við hesum uppskoti høvdu vit sloppið undan tí mannamuni, at summi húsarhald sleppa undan at rinda, meðan onnur rinda upp í fleiri.

Harnæst sluppu vit undan tí skeivleika, sum liggur í, at lógir hvørka virka eftir ætlan ella verða fylgdar.

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í mentanar- og skúlanevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 18. mars 1987 og varð eftir 1. viðgerð 31. mars 1987 beint í mentanar- og skúlanevndina. Endamálið við uppskotinum er at broyta lógina um útvarpið soleiðis, at hvørt húsarhaldið bert rindar fyri ein radiomóttakara. Sama skal galda fyri skip, handlar, virki, skrivstovur o.t.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) vísir á, at landsstýrið í løtuni arbeiðir við broytingum í løgtingslóg um Útvarp Føroya, og metir meirilutin tí onga orsøk vera til, at løgtingið ger broytingar í hesi lóggávu júst nú. Út frá hesum setir meirilutin einki uppskot fram.

Ein minniluti (Óli Breckmann) mælir til at samtykkja uppskotið óbroytt.

Ein annar minniluti (Eilif Samuelsen) heldur, at tær upplýsingar, sum eru í uppskotinum, eru ikki nóg neyvar og kunnu tí valla leggjast til grund fyri eini skynsamligari ásetan av lurtaragjaldinum.

Sambandsfloksins hugsan er, at útvarpið eigur at fáa sínar rakstrarútreiðslur goldnar av lurtaragjaldi og kunngerðum.

Ein umlegging av skipanini um, hvørji lurtitól skulu rinda lurtaragjald, má byggja á haldgott útrokningargrundarlag, so inntøkan av gjaldinum gevur umleið tað sama sum undir verandi skipan.

Minnilutin setir tí fylgjandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða reglurnar um Útvarp Føroya og at leggja uppskot fyri tingið so skjótt sum til ber.

2. viðgerð 9. apríl. Uppskotið frá minnilutanum í nevndini fall við 6-0 atkvøðum. § 1 í upprunauppskotinum fall við 2-0 atkvøðum. Málið sostatt burturdottið.

103 Løgtingslóg um aling av fiski v.m.

Ár 1987, fríggjadagin 13. mars, legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um aling av fiski v.m.

§ *1.* Alivirksemi í hesi lóg fevnir um alt virksemi, har ein fóðrar ella fer um fisk, onnur djórasløg ella plantur í vøtnum ella á sjónum, til framleiðslu av mati, fóðri ella yngli.

§ *2.* Loyvi frá landsstýrinum krevst til at byggja, gera til, umskipa, víðka, keypa, reka, eiga ella eiga í støð til alivirksemi. Til alivirksemi uttan alistøð krevst eisini loyvi frá landsstýrinum.

2. stk. Landsstýrið kann í loyvinum ásetu nærri fylgistreytir.

§ *3.* Aliloyvi kann ikki verða givið, um

1) alistøðin ber við sær serligan vanda fyri spjaðing av sjúku,
2) alistøðin ber við sær skaðiligar árin á vistskipanina,
3) umsøkjarin ikki hevur neyðugan kunnleika til alivirksemi,
4) teir, sum avgerðarrættin skulu hava á alistøðini, ikki hava neyvt tilknýti til økið, har alivirksemi fer fram,

lagtingslov om opdræt af fisk m.v.

§ *1.* Opdrætsvirksomhed i denne lov omfatter al virksomhed, hvor man fodrer eller passer fisk, andre dyrearter eller planter i søer eller havet, til produktion af madvarer, foder eller yngel.

§ *2.* Der kræves tilladelse fra landsstyret til at bygge, indrette, omordne, udvide, købe, drive, eje eller eje del i station til opdrætsvirksomhed. Til opdrætsvirksomhed uden opdrætsstation kræves også tilladelse fra landsstyret.

Stk. 2 Landsstyret kan i tilladelsen fastsætte nærmere vilkår.

§ *3.* Opdrætstilladelse kan ikke gives, såfremt

1) opdrætsstation medfører særlig fare for spredning af sygdomme,
2) opdrætsstation medfører skadelige følger for den økologiske struktur,
3) ansøgeren ikke har nødvendigt kendskab til opdrætsvirksomhed,
4) de, som skal have bestemmelsesretten på opdrætsstationen, ikke har nær tilknytning til det område, hvor opdrætsvirksomheden foregår,

5) nakar ella nakrir av eigarunum av ætlaðu støðini eiga meirilutan ella týðandi minnilutapartar í aðrari alistøð,
6) alistøðin fordar fyri, at møguleikar verða givnir alivinnuni fyri javnari og skynsamari menning á tryggum fíggjarligum og vísindaligum støði í øllum liðum.
7) alistøðin kemur at liggja til ampa fyri umhvørvinum ella øðrum virksemi í økinum.

§ 4. Landsstýrið kann taka loyvi smb. § 2 aftur í hesum førum:
1) um alistøðin ber við sær serligan vanda fyri spjaðing av sjúku,
2) um alistøðin ber við sær skaðiligt árin á vistskipanina,
3) tá eigararnir av alistøð eiga meirlutan ella týðandi minnilutapartar í aðrari alistøð,
4) um alistøðin ikki letur landsstýrinum tær upplýsingar, sum kravdar verða.

2. stk. Loyvið kann verða afturtikið, um virksemi á alistøð er til ampa fyri umhvørvið, ferðslu ella annað virksemi á økinum. Tó kann hetta ikki verða gjørt í førum, har bøtt kann verða um skaðan ella ampan, ella um alistøðin verður flutt eftir boðum myndugleikanna.
3. stk. Loyvið kann takast aftur, um tað ikki innan ávísa av landsstýrinum ásetta freist verður nýtt, ella um loyvið bert hevur verið nýtt í lítlan mun.

5) nogen eller nogle af ejerne af en planlagt opdrætsstation har majoriteten eller betydelige minoriteter i en anden opdrætsstation,
6) opdrætsstationen er til hinder for, at der gives opdrætserhvervet mulighed for jævn og rationel udvikling på et betryggende financielt og videnskabeligt grundlag i alle led,
7) opdrætsstationen kommer at beligge til ulempe for miljøet eller anden virksomhed i området.

§ 4. Landsstyret kan tilbagekalde en tilladelse i henhold § 2 i disse tilfælde:
1) såfremt opdrætsstationen medfører særlig fare for spredning af sygdomme,
2) hvis opdrætsstationen medfører skadelige virkninger på de økologiske forhold,
3) hvis ejerne af opdrætsstationen har majoriteten eller betydelige minoriteter i en anden opdrætsstation,
4) hvis opdrætsstationen ikke giver landsstyret de oplysninger, som kræves.

Stk. 2 Tilladelsen kan tilbagekaldes, såfremt virksomheden på opdrætsstationen er til ulempe for miljøet, færdsel eller anden virksomhed i området. Dog kan dette ikke ske i tilfælde, hvor skaden eller ulempen kan udbedres, eller såfremt opdrætsstationen flyttes efter myndighedernes påbud.
Stk. 3. Tilladelsen kan tilbagekaldes, såfremt tilladelsen ikke udnyttes inden en vis af landsstyret fastsat frist, eller såfremt tilladelsen kun er benyttet i mindre udstrækning.

§ 5. Landsstýrið kann seta reglur um býti av lívfiski, rogni, yngli og sjóbúnum fiski til aliendamál.

§ 6. Ferðsla og virksemi á vøtnum og á sjónum nærhendis alistøðum skal fara fram við varsemi, og kann landsstýrið við kunngerð áseta nærri reglur um hetta.

§ 7. Vaktar- og bjargingartænastan kann við merking, eitt nú við boyum og skeltum, seta forboð fyri at veiða fisk nærri enn 300 m frá alistøð, tá hesin av óvart er sloppin út, solciðis at eigarin hevur møguleika at veiða fiskin aftur.

§ 8. Landsstýrisins umboð hava við neyðugari lógváttan og uttan rættarskurð atgongd til at koma inn á alistøð bæði innandura og uttandura at gera kanningar, sum eru neyðugar til fyrisiting lógarinnar.

§ 9. Landsstýrið kann áleggja alara at fáa settar í verk regluligar kanningar av umhvørvinum nærhendis avvarðandi alistøð. Um alari ikki ger eftir boðum landsstýrisins, kann landsstýrið fyri rokning alarans seta í verk slíkar kanningar.

§ 10. Landsstýrinum er heimilað at gera neyvari reglur fyri at fremja tað, sum ásett er í lógini við serligum atliti til krøv um fakligar royndir innan havbúnað og til, hvørjir stovnar skulu hava fyrisitingina av alivinnuni um hendur.

§ 5. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om fordeling af opdrætsfisk, rogn, yngel og sømoden fisk til opdrætsformål.

§ 6. Færdsel og virksomhed på indsøer og i havet nær opdrætsstationer skal foregå med varsomhed, landsstyret kan ved bekendtgørelse fastsætte nærmere regler herom.

§ 7. Vaktar- og bjargingartænastan kan ved afmærkning, f.eks med bøjer og opslag, sætte forbud for at fange fisk nærmere end 300 m fra en opdrætsstation, når denne ufarvarende er sluppet fri, således at ejeren har mulighed for at fange fisken igen.

§ 8. Landsstyrets repræsentanter har mod behørig legitimation og uden retskendelse adgang til opdrætsstation både indendørs og udendørs for at foretage de undersøgelser, som er nødvendige for at administrere loven.

§ 9. Landsstyret kan pålægge en opdrætter at foranstalte regelmæssige undersøgelser af miljøet nær vedkommende opdrætsstation. Såfremt en opdrætter ikke retter sig efter landsstyrets påbud, kan landsstyret for opdrætterens regning iværksætte sådanne undersøgelser.

§ 10. Landsstyret er bemyndiget til at fastsætte nærmere regler for gennemførelsen af det i loven fastsatte særlig med hensyn til krav om faglige erfaringer indenfor havopdræt, samt hvilke institutioner, der skal administrere opdrætserhvervet.

§ *11.* Landsstýrið kann leggja heimildir sínar eftir lógini til annan stovn. Landsstýrið kann áseta reglur um kæru av avgerðum hjá hesum.

§ *12.* Brot á §§ 2, 6 og 7 verður revsað við bót.
2. stk. Í reglum, sum verða givnar eftir §§ 5 og 10 í lógini, kann verða ásett bót fyri at bróta ásetingarnar í reglunum.
3. stk. Er brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum sjálvum.

§ *13.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
2. stk. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 57 frá 24. mai 1974 um bygging, innrætting, nýskipan og víðkan av virkjum til kleking av rognum og til fiskaaling, sum broytt við løgtingslóg nr. 60 frá 2. august 1985.

§ *14.* Aliloyvi fingin, áðrenn henda lóg fær gildi, verða framvegis í gildi við teimum treytum og fyri tað tíðarskeið, ið tilskilað er í loyvinum.

§ *11.* Landsstyret kan henlægge sine beføjelser efter loven til en anden institution. Landsstyret kan fastsætte regler om klage over dennes afgørelser.

§ *12.* Overtrædelse af §§ 2, 6 og 7 straffes med bøde.
Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af §§ 5 og 10, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelserne i forskrifterne.
Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.

§ *13.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.
Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 57 af 24. maj 1974 om bygning, indretning, etablering og udvidelse af anlæg til udklækning af rogn og til opdræt af fisk, som ændret ved lagtingslov nr. 60 af 2. august 1985.

§ *14.* Opdrætstilladelser, der er udstedt før denne lovs ikrafttræden, er fortsat gældende med de betingelser og i det tidsrum, der er fastsat i tilladelsen.

1. **Almennar viðmerkingar**

1.1 Í reglugerð fyri Aliráðið § 4, 2. stk. verður sagt: »Ráðið ger uppskot til løgtingslóg um øll viðurskifti, sum viðkoma aling og havbúnaði, heruppí eisini um havbit.« Eisini hevur landsstýrið heitt á ráðið um í hesi tingsetu at evna lógaruppskot, ið veitir myndugleikunum greiðari heimildir at fyrisita alivinnuna eftir og at avloysa núverandi lóggávu.

Ráðið byrjaði arbeiðið at orða lógaruppskot í juli 1986, og hava arbeiðsuppskot ráðsins so við og við verið send landsstýrinum til kunningar og viðmerkingar.

Ráðið hevur kunnað seg um danska, norska og íslendska lóggávu um fiskaaling og havbúnað, og er hetta uppskot í størsta mun ávirkað av norsku lógini »Opdrett av fisk, skalldyr m.v.« frá 14. juni 1985.

Landsstýrið hevur tilevnað uppskotið við uppskoti aliráðsins sum fyrimynd.

1.2. **Figgjarligar avleiðingar av lógaruppskotinum**
Lógin í sjálvum sær førir helst ikki stórvegis av útreiðslum við sær, tí ætlanin er, at verandi fakstovnar, eitt nú Landsverkfrøðingurin, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Landsdjóralæknaembætið, Fiskirannsóknarstovan og møguliga onnur við, hvør sær á sínum fakliga øki skulu fyrisita alivinnuna við Aliráðnum sum samskipanarliði. Tó verða nevndu stovnar so við og við neyddir innanhýsis at seta av arbeiðsmegi, at arbeiða við uppgávum í sambandi við fiskoaling. Her verður mest hugsað um fysiska planlegging á sjónum (Landsverkfrøðingurin), umhvørvisspurningar (Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Fiskirannsóknarstovan) og veterinerir spurningar (Landsdjóralæknaembætið).

Aliráðið sum samskipanarlið á økinum metir seg fyri fyrst at kunna rokja sín part.

1.3. **Galdandi lóggáva**
Galdandi reglur um fiskaaling eru at finna í løgtingslóg nr. 57 frá 24. mai 1974 sum broytt við løgtingslóg nr. 60 frá 2. august 1985, lóg nr. 107 om »Beskyttelse af muslinger« frá 14. apríl 1973 og í kunngerð nr. 63 frá 2. august 1985 um reglugerð fyri aliráðið.

2. **Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**
Til § 1. Greinin førir við sær, at øll aling av livandi verum í vatni og sjógvi eru umfatað.

Roynt hevur verið at fingið alt virksemi við verum, ið liva í vatni ella í sjógvi, at verið umfatað til tess at skapa møguleikar fyri á besta hátt at nýta okkara avmarkaða tilfeingi til pláss og fyri at fyribyrgja, at neyðugt verður við lógarbroytingum, um nýggir møguleikar at ala verða veruleiki.

Fiskur v.m. umfatar bæði tey sløgini, vit í dag hava royndir við at kunna ala, og sløg, ið kunnu koma at verða ald, t.d. æti, tari og tílíkt.

Til § 2. Tað verður hildið neyðugt at krevja loyvi til í øllum liðum innan aling, um vinnan skal samskipast, menast og uthyggjast á skilabestan hátt.

Loyvi eftir § 2 verður givið til ávis pláss ella øki og við teimum avmarkingum annars, sum landsstýrið hevur sett ella setir.

Loyvi verður givið til ávíst fiskadjór ella plantuslag og til ávíst alivirksemi.

Til § 3, nr. 1: Reglan skal síggjast í sambandi við løgtingslógina um fiskasjúku v.m.

Til § 3, nr. 2: Vit vita, at alibrúk í sjálvum sær hava vit sær eitt ávist árin á mer- og fjarumhvørvið. Árinið av hesum kann verða vandamikið, bæði fyri alibrúkið sjálvt og fyri umhvørvið annars, og er heimild til fyribyrgjandi tiltøk á hesum øki serliga umráðandi, so leingi sum eingin umhvørvislóg er.

Til § 3, nr. 3: Í dag verður kravt, at fólk er á alistøðini, ið hevur í minsta lagi 6 mánaða praktiskar royndir. Um vit framvegis skulu klára okkum í kappingini

við aðrar alitjóðir, er neyðugt at hækka kunnleikastøðið hjá føroysku alarunum, bæði innan praktikk og teori. Tað almenna eigur at hjóða bæði verandi og komandi alarum útbúgving og samstundis so við og við bert geva loyvi treytað av, at fólk, ið hava ábyrgd av alistøð, skulu lúka ávís útbúgvingarlig krav í tann mun, tilboð um útbúgving eru tøk.

Til § 3, nr. 4: Um alivinnan skal kunna stimbra lokala vinnulivið á staðnum, er helst neyðugt at tryggja, at lokalar kreftir hava avgerðarrættin á alistað. Hinvegin er og verður alivinnan ein heldur fíggjar- og kunnleikakrevjandi vinna. Tí eigur reglan at vera fyrisitin soleiðis, at neyðug fíggjan og kunnleiki kunnu koma til alistøðina aðrastaðni frá. Kravt kann tí verða, at persónar, ið búgva í lokaløkinum, skulu eiga í minsta lagi 51% av eginpeningunum í alistøðini. Um talan er um juridiskar persónar sum eigarar, skulu hesir hava heimstað í kommunu í økinum, har alistøðin liggur, og skulu í minsta lagi 51% av kapitalinum, ið hevur avgerðarrætt, verða knýtt at persónum, ið búgva í lokaløkinum.

»Økið« eigur ikki at vera avmarkað til kommunumark, men heldur eigur at verða hugsað um økir, sum t.d. Suðuroy, Sandoy, Vágarnar, Norðstreymoy (vestursíðan), Suðurstreymoy, í Sundunum, Eysturoy (eystari partur) og Norðoyggjar.

Til § 3, nr. 5: Reglan skal fyribyrgja, at alivinnan verður á heilt fáum hondum, men kunnu persónar og juridiskir persónar at byrja við eiga minnilutapartar í fleiri alistøðum. Um slíkir minnilutapartar verða nýttir til at vinna sær týðandi vald í vinnuni sum heild, eiga tiltøk at verða sett í verk, ið seta nærri reglur fyri møguleikunum at keypa/eiga minnilutapartar í fleiri alistøðum.

Til § 3, nr. 6: Miðað eigur at verða ímóti at útbyggja vinnuna líðandi, soleiðis at loyvini at ala til matna samsvara við loyvini at ala sjóbúnan fisk. Eisini eigur at verða miðað ímóti, at vinnan verður útbygd í eindum, sum tryggja, at neyðuga fíggjarliga grundarlagið er til staðar, bæði til at byrja við at ala og til framhaldandi at reka alistøð. Útbygging vinnunnar má vera á einum tryggum støði, bæði hvat alitilfari og kunnleika viðvíkur, hartil krevst, at royndarstøð landsins verða givnir møguleikar fyri framhaldandi at bjóða vinnuni góð alidjór og hollan kunnleika.

Til § 3, nr. 7: Reglan skal nýtast til at fyribyrgja óskili á alioki okkara, ið er avmarkað í støddd, og sum í nógvum førum má kappast við aðrar vinnugreinir og annað týdningarmikið virksemi. Henda heimild er serliga týdningarmikil, so leingi vit í Føroyum ikki hava eina høvuðslóggávu um fysiska planlegging á landi og á sjónum.

Til § 4: Afturtøka av loyvi er eitt álvarsligt stig. Hvussu hetta stig kann fremjast, eigur í lógini at vera greinað út í æsir, soleiðis at rættarstøðan hjá loyvishavara er púra greið.

Til § 5: Heimildin verður í høvuðsheitum at nýta til tess at tryggja, at sjóbúgvin fiskur er til allar alarar, ið ala til matna.

Til § 6: Reglan skal verja ímóti, at fólk gera seg inn á alistøðir við t.d. at taka fisk úr ringunum, við at dálka sjógvin nærhendis støðini ella við at óreinsa fiskin við óljóði og ristingum/aldum ella tílíkum. Reglurnar eiga at verða ásettar í samráð við avvarðandi myndugleikar og Havbúnaðarfelagið.

Til § 9: Hugsað verður um vatn- og sjógvroyndir og royndir av botntilfari at senda avvarðandi starvsstovu. Hetta eigur at vera náttúrligur partur av arbeiðinum á alistød til tess at tryggja alaran og umhvørvi okkara.

Úrslitini av royndunum kunnu samstundis nýtast av okkara granskingar- og umsitingarstovnum í dagliga arbeiði teirra.

Til § 10: Vanlig heimildargrein. Útbúgving er tó serliga nevnd til tess at leggja dent á týdningin av hesum. Somuleiðis verður rættur landsstýrisins at býta fyrisitingarheimildirnar nevndur fyri at vísa á landsstýrisins heimild at umskipa umsitingina av alivinnuni eftir tørvi.

Til § 11: Møguleiki er eftir hesi grein hjá landsstýrinum at lata Aliráðnum ábyrgdina fyri alingina.

1. viðgerð 24. mars. Skotið varð upp at beina málið í fiskivinnunevndina, hetta fall við 11-0 atkvøðum. Jógvan Sundstein viðmerkti, at hetta var brot í tingskipanina. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 13. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 23. í sama mánaði beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er talan um eitt sera umfatandi lógaruppskot. Tá nóg góðar stundir ikki hava verið til at viðgera málið, og tá ídnaðarnevndin hevur fingið beinleiðis áheitan frá felag, knýtt tætt at vinnuni, verður sett fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur ídnaðarnevndini at viðgera fyriliggjandi lógaruppskot sum millumtinganevnd og at leggja málið aftur fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni 1987.

2. viðgerð 13. apríl. Atkvøðugreiðsla 14. apríl. Uppskotið til samtyktar frá ídnaðarnevndini samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL. j.nr. 1509-17

104 Lóg um mynstring

Ár 1987, friggjadagin 13. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um mynstring.

§ *1.* Mynstrað verður, tá sjófólk tekur við ella fer úr starvi sínum umborð á einum føroyskum skipi.

§ *2.* Við mynstring skilst í hesi lóg, at ein manningarlisti verður skrivaður og undirskrivaður av sjófólkinum og skipsføraranum, og at sjófartsbókin ella siglingarskjalið verður skrivað og undirskrivað av skipsføraranum.
2. stk. Í manningarlistanum verður at tilskila, eftir hvørjum sáttmála mynstrað verður.
3. stk. Orðið »sjófólk« merkir í hesi lóg ein og hvør, skipsførarin undantikin, ið starvast umborð á einum skipi til sjós.

§ *3.* Tá mynstrað verður, skal skipsførarin ansa, at viðkomandi sjófólk lúka treytirnar í lóg, serstakliga m.a. krøv um aldur, heilsu og útbúgving.
2. stk. Manningarlistin skal skrivast á blað, sum Føroya landsstýri hevur góðkent.
3. stk. Skipsførarin skal, hvørja ferð mynstrað verður, senda eintak av manningarlistanum til mynstringarmyndugleikan.

lagtingslov om mønstring af søfarende.

§ *1.* Mønstring skal finde sted, når en søfarende tiltræder eller fratræder sin tjeneste i et færøsk skib.

§ *2.* Ved mønstring forstås i denne lov, at en bemandingsliste bliver udfyldt og underskrevet af den søfarende og skibsføreren, og at den søfarendes søfartsbog eller fartsbevis udfyldes og underskrives af skibsføreren.
Stk. 2. I bemandingslisten skal anføres, efter hvilken hyreaftale der påmønstres.
Stk. 3. Udtrykket »søfarende« omfatter i denne lov enhver person, bortset fra skibsføreren, der udfører arbejde om bord i et skib i søen.

§ *3.* Skibsføreren skal ved mønstring påse, at lovgivningens forskrifter er opfyldt for den pågældende søfarende, herunder navnlig de aldersmæssige, helbredsmæssige og uddannelsesmæssige krav.
Stk. 2. Bemandingslisten skal udfærdiges på en formular, Færøernes landsstyre har godkendt.
Stk. 3. Skibsføreren skal efter hver mønstring sende en genpart af bemandingslisten til mønstringsmyndigheden.

Stk. 4. Manningarlistin skal sendast mynstringarmyndugleikanum áðrenn fráferð.

§ *4.* Føroya landsstýri ásetir nærri reglur um mynstring og um eftirlit við mynstring.
2. stk. Føroya landsstýri kann áseta reglur um hóskandi frávik í reglunum í § 1 og § 3, 3. stk.

§ 5. Eftirlit við mynstringum hevur ein mynstringarmyndugleiki, hvørs bygnaður og starvsøki verða ásett av Føroya landsstýri.
2. stk. Haraftrat skal mynstringarmyndugleikin hava eftirlit við, at lógarinnar reglur um manning verða hildnar.

§ 6. Mynstringarmyndugleikin kann frá reiðaríinum krevja allar upplýsingar um manning og skip, sum eru neyðugar vegna eftirlitið.
2. stk. Mynstringarmyndugleikin hevur loyvi til á øllum føroyskum skipum at gera tær kanningar, sum eru neyðugar vegna eftirlitið.

§ 7. Brot á §§ 1 og 3 koma undir bót, um ikki harðari revsing er uppiborin eftir borgarligu revsilógini.
2. stk. Á sama hátt verður tann revsaður, ið ikki gevur tær upplýsingar, sum kravdar verða, at hann skal sbrt. § 6, 1. stk.
3. stk. Í reglunum, sum verða heimlaðar sbrt. § 4, 1. stk., kann bót fyri brot á reglurnar verða ásett.

Stk. 4. Bemandingslisten skal tilsendes mønstringsmyndighederne inden skibets afrejse.

§ *4.* Færøernes landsstyre fastsætter nærmere regler om mønstring og om kontrol med mønstring.
Stk. 2. Færøernes landsstyre kan fastsætte regler om sådanne lempelser i bestemmelserne i § 3, stk. 3, som skønnes hensigtsmæssige.

§ 5. Kontrol med mønstringen forestås af en mønstringsmyndighed, hvis organisation og arbejdsområde fastsættes af Færøernes landsstyre.
Stk. 2. Endvidere skal mønstringsmyndigheden føre kontrol med, at lovgivningens forskrifter om skibes bemanding overholdes.

§ 6. Mønstringsmyndigheden kan af rederi eller skibsfører kræve alle oplysninger om skibsmandskab og skib, som er nødvendige af hensyn til kontrollen.
Stk. 2. Mønstringsmyndigheden er berettiget til på ethvert færøsk skib at foretage de undersøgelser, som er nødvendige af hensyn til kontrollen.

§ 7. Overtrædelse af §§ 1 og 3 straffes med bøder, medmindre højere straf er forskyldt efter borgerlig straffelov.
Stk. 2. På samme måde straffes den, der undlader at meddele de oplysninger, som afkræves ham i medfør af § 6, stk. 1.
Stk. 3. I forskrifter, som udstedes i henhold til § 4, stk. 1, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

§ 9. Henda lóg kemur í gildi, tá ið hon verður kunngjørd. Samstundis fara úr gildi lóg nr. 76 frá 31. mars 1937 »om Forhyring og Mønstring af Skibsmandskab« sbrt. »Anordning nr. 48 af 7. marts 1938 om ikrafttræden af de i Lov om Forhyring og Mønstring af Skibsmandskab indeholdte Bestemmelser om Forhyring« og løgtingslóg nr. 6 frá 21. mars 1968 um broyting í reglunum um mynstring av skipsmanningum.

§ 9. Loven træder i kraft ved dens kundgørelse. Samtidig ophæves lov nr. 76 af 31. marts 1937 om Forhyring og Mønstring af Skibsmandskab jfr. Anordning nr. 48 af 7. marts 1938 om krafttræden af de i Lov om Forhyring og Mønstring af Skibsmandskab indeholdte Bestemmelser om Forhyring, og lagtingslov nr. 6 af 21. marts 1968 om ændring af bestemmelserne om mønstring af skibsmandskaber.

Viðmerkingar:

Á vári 1986 byrjaði ein arbeiðsbólkur, sum Føroya Landsstýri setti, við umboðum frá Føroya Fútaskrivstovu, Lønjavniugargrunni Skipsfiskimanna, Landsskúlafyrisitingini og Føroya Landsstýri, at arbeiða við málinum um at gera eina føroyska lóg um mynstring.

Málið er eitt sermál, men higartil hevur Føroya Landfúti, sýslumenn og teir av landsstýrinum tilnevndu persónar á bygd, har eingin sýslumaður er, umsitið málið.

Arbeiðsbólkurin hevur havt fundir um málið og eisini havt fundir við umboð fyri Fiskivinnuráðið, Reiðarafelagið, Fiskimannafelagið og brævaskifti við Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Arbeiðsbólkurin hevur mælt til, at ein mynstringarmyndugleiki verð varðveittur, og at skiparin sjálvur skuldi mynstra og síðani geva boð til áðurnevnda mynstringarmyndugleika.

Galdandi lóg á økinum í dag er danska lógin nr. 76 frá 31. mars 1937 »om forhyring og mønstring af skibsmandskab« við seinni broytingum. Henda lóg fyrisetir eina árliga mynstring + til/frágongd, og mynstrað verður við mynstringarmyndugleika.

Praksis er í dag heilt øðrvísi, enn lógin fyriskrivar. Mynstrað verður við mynstringarmyndugleika, nevniliga umboð frá fútaskrivstovuni og ávísum øðrum, men mynstrað verður á t.d. feskfiskaskipum fyri hvønn túr sær, ikki fyri at 1937-lógin skal verða hildin, men av tí at treytin fyri t.d. at fáa minstavinning og annan stuðul frá tí almenna krevur, at mynstrað verður fyri hvønn túr sær.

Hesi sjónarmið legði arbeiðsbólkurin fyri landsstýrið, og landsstýrið samtykti á fundi 1. august 1986 í prinsippinum, at tað í framtíðini verður skiparin, ið mynstrar við fráboðan til mynstringarmyndugleikan (fiskivinnustjóran).

Arbeiðsbólkurin arbeiddi síðani víðari við málinum og hevur nú lagt uppskot fyri landsstýrið um lóg um mynstring og kunngerð um mynstring av sjófólki.

§ 1 sigur, at mynstrað verður, tá ið sjófólk tekur við ella fer úr starvi sínum umborð á eitt føroyskt skip.

§ 2 sigur, hvat verður skilt við mynstring í hesi lóg, nevniliga at ein manningarlisti verður undirskrivaður av sjófólkinum og skipsføraranum, og at sjófartsbókin hjá viðkomandi sjófólki ella siglingarskjali verður undirskrivað av skipsføraranum.

Manningarlistin tilskilar eisini, eftir hvørjum sáttmála mynstrað verður.

Fiskivinnustjórin letur gera oyðublað til manningarlistan, og í honum verða teigar um navn, heiti og annars tað, sum skipsmanningarlistin í dag inniheldur.

§ 3 áleggur skipsraranum at ansa, at sjófólkini lúka treytirnar í lógini, harundir at skipið verður forsvarliga mannað.

Manningarlistin skal áðrenn fráferð sendast mynstringarmyndugleikanum.

§ 4 sigur, at Føroya Landsstýri skal áseta nærri reglur um mynstring og eftirlit við mynstring. Hetta verður gjørt við eini kunngerð um mynstring av sjófólki, og eftirlitið við mynstringini verður bundið saman við skjalinum manningarskjalið, sonevnda »Minimum Safe Manning Document«, sum føroysk skip skulu hava umborð, og sum tilskilar ta manning, sum manningarlógin krevur.

§ 5 sigur, at eftirlitið við mynstringum er hjá einum mynstringarmyndugleika, hvørs bygnaður og starvsøki verða ásett av landsstýrinum.

§ 6 heimilar mynstringarmyndugleikanum at krevja ymsar upplýsingar frá reiðarínum.

§ 9 sigur, at lógin kemur í gildi, tá ið hon verður kunngjørd.

Áðrenn lógin verður kunngjørd, skal ein kunngerð um mynstring av sjófólki lýsast. Manningarlistin skal verða gjørdur, og eisini skal ein leiðbeining sendast øllum reiðarium um, hvussu farast skal fram, tá mynstrað verður reint praktiskt.

§ 9 lýsir eisini, hvørjar danskar lógir og eisini nakrar føroyskar skulu fara úr gildi, nú føroyska lógin um mynstring verður sett í gildi.

Uppskot til kunngerð um mynstring av sjófólki er viðløgd sum skjal 1.

Uppskot

Kunngerð

um

mynstring av sjófólki

Við heimild í § í løgtingslóg nr. frá..... um mynstring hevur landsstýrið fyrisett:

§ *1.* Fiskivinnustjórin ella onnur, sum Føroya Landsstýri tilnevnir, útinna tær heimildir, tillagdar eru mynstringarmyndugleikanum og eftirlitinum í lóg um mynstring.

§ *2.* Tá sjófólk gor avtalu um tænastu umborð á einum føroyskum skipi, skal ein manningarlisti verða skrivaður og undirskrivaður.
2. stk. Tá ein manningarlisti verður skrivaður, skal bert tann manningarlistin, ið fiskivinnustjórin hevur latið gjørt, verða nýttur.
3. stk. Manningarlistin skal verða skrivaður samsvarandi leiðbeining fiskivinnustjórans.
4. stk. Áðrenn skipsførarin skrivar undir manningarlistan, skal hann ansa eftir, at lógarinnar krøv um aldur, læknakanning, útbúgving eru lokin.

§ *3.* Manningarlistin skal sendast fiskivinnustjóranum samsvarandi leiðbeiningini nevnd í § 2, 3. stk.

§ *4.* Eitt eintak av øllum manningarlistunum fyri sjófólkinum, ið er ella hevur verið í tænastu umborð, skal savnast saman í eini mappu, nevnd skipsmanningarlistin, ið altíð skal vera umborð.

§ *5.* Tá sjófólk tekur við ella fer úr sínum starvi umborð, skal skipsførarin skriva og undirskriva sjófartsbókina ella siglingarskjalið hjá tí sjófarandi.
2. stk. Í sjófartsbókina ella siglingarskjalið skal verða skrivað skilliga. Býar- og skipanøvn skulu ikki styttast. Stýrimenn og maskinmeistarar skulu verða lýstir við starvi sínum umborð. Á skipum, har bert ein stýrimaður ella ein maskinmeistari er, skal heitið »einastýrimaður« ella »einamaskinmeistari« verða nýtt.
3. stk. Í førum, har Føroya landsstýri hevur givið viðkomandi sjófólki undantaksloyvi frá galdandi útbúgvingarkrøvum, skal hetta verða tilskilað í sjófartsbókini ella siglingarskjalinum hjá avvarðandi.

§ 6. Reglurnar í hesi kunngerð eru galdandi fyri øll føroysk skip yvir 20 brutto reg. tons og fyri øll ferðamannaskip.

§ 7. Mynstringarmyndugleikin ella tann myndugleikin, sum Føroya landsstýri heimilar, gevur út sjófartsbøkur.

§ 8. Brot móti ásetanum í hesi kunngerð verða sektað við bót eftir mynstringarlógini.

Føroya Landsstýri . mars 1987

landsstýrismaður

1. viðgerð 18. mars. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 7. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av landsstýrinum tann 12. mars 1987 og varð aftan á 1. viðgerð tann 18. mars 1987 beint í fiskivinnunevndina.

Høvuðsbroytingin til galdandi skipan, iðstendst av uppskoti landsstýrisins er tann, at skiparin sjálvur mynstrar manningina og síðani gevur boð til mynstaringarmyndugleika, ið verður fiskivinnustjórin, í staðin fyri landfútan, sýslumenn og teir av landsstýrinum tilnevndu persónar á bygd, har eingin sýslumaður er.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður m.a. sagt, at ein arbeiðsbólkur, settur av landsstýrinum, hevur arbeitt við hesum máli og hevur havt fund við umboð fyri Fiskivinnuráðið, Reiðarafelagið, Fiskimannafelagið, og at brævaskifti hevur verið við Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Fiskivinnunevndin hevur hildið fund við umboð fyri Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið um hetta lógaruppskot.

Somuleiðis hevur nevndin hildið fund við arbeiðsbólkin, ið hevur arbeitt við hesum máli.

Á hesum fundum kom til sjóndar, at tað er ikki full semja í bólkinum um framlagda uppskot. Á fundinum varð eisini víst á, at henda lóg hevur tilknýti til sjómanslóggávuna.

Landsstýrið hevur boðað frá, at nýggj sjómanslóggáva verður løgd fram í hesi tingsetuni. Slíkt mál krevur gjølla viðgerð og verður uttan iva beint í eina millumtinganevnd, ið leggur álitið fram í ólavsøkutingsetuni.

Fiskivinnunevndin mælir til, at málið um lóg um mynstring verður viðgjørt framhaldandi av fiskivinnunevndini, sum síðan leggur málið framaftur í ólavsøkutingsetuni. Samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur fiskivinnunevndini at viðgera lógaruppskotið um mynstring sum milluntinganevnd og at leggja málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 8. apríl. Nevndarinnar uppskot til samtyktar samtykt við 26-0 atkvøðum.

FL, j.nr. 1609-7

105 Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu

Ár 1987, fríggjadagin 13. mars legði Jóngerð Purkhús landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av húsaognum.	*lagtingslov om køb af husejendomme.*
§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at keypa og innrætta ognirnar matr. nr. 620m, 620 n, 621d, 620æ og 620e í Tórshavn.	§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at købe og indrette matr. nr. 620m, 620n, 621d, 620æ og 620e i Tórshavn.

§ 2. Játtaðar verða kr. 11.000.000, sum verða at leggja út úr landskassanum ella fíggjast við lánupptøku.

§ 2. Der bevilges hertil kr. 11.000.000, som betales af landskassen eller finansieres ved optagelse af lån.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur herfyri samtykt at arbeiða fyri at skilja tollfyrisitingina burtur úr Føroya Gjaldstovu.

Spurningurin um sjálvstøðuga tollfyrisiting hevur fyrr verið havdur á lofti eftir ynski frá núverandi leiðslu á gjaldstovuni.

Í sambandi við at stjórin á gjaldstovuni fer frá í næstum, og at landsstýrið hevur samtykt at fremja eina umskipan av tolllóggávuni sum heild, verður hildið hóskiligt at fara undir hetta tiltak nú.

Sum er húsast øll gjaldstovan í hølunum við Kongabrúnna, sum eru leigað, men undir sera trongligum umstøðum fyri bæði tolldeildina og roknskapardeildina og als ongum møguleikum fyri øktum virksemi á hesum báðum deildum.

Herumframt húsast skattadeildin undir Føroya Gjaldstovu (innheinting av eftirstøðum og pantifútar) í Jónas Broncksgøtu har, sum eisini Almannadeildin heldur til.

Fyri at loysa spurningin um at loysa tolldeildina burtur úr gjaldstovuni verður tí hildið neyðugt at útvega hóskandi høli til tolldeildina við tí starvsfólki, hon hevur í dag, og við møguleikum fyri øktum virkseni, sum ivaleyst verður neyðugt við einari umskipan av tolllóggávuni, men eisini fyri at styrkja um tollfyrisitingina yvirhøvur.

Verður tolldeildin flutt í onnur høli, soleiðis sum ætlanin er við hesum keypi, verður plass fyri at flyta Skattadeildina saman við gjaldstovuni, sum skattadeildin er ein náttúrligur partur av, og harvið høvdu høli verið gjørd leys til nýtslu fyri Almannastovuna, sum eisini hevur hølistrupulleikar. Í roynd og veru hongur loysn av hølistrupulleikunum hjá Almannastovuni saman við eini samlaðari loysn fyri núverandi gjaldstovuna (tolldeild, bókhaldsdeild og skattadeild).

Landstýrið hevur í boði at keypa ognina hjá P/f Vilhelm Nielsen í Jónas Broncksgøtu (matr. nr. 620m, 620n, 621d og 620æ), tilsamans 1151 m² og ognina við síðuna av (matr. nr. 620e) hjá Julius á Syðradali, keypt av P/f Vilhelm Nielsen í 1986. Hetta matr. nr. er 445 m² við ástandandi gomlum húsum, ella tilsamans 1.596 m².

Sum tað framgongur av upplýsingunum frá Jórun í Dali, arkitekti, fáast í fyrstu syftu hóskilig skrivstovuhøli til tolldeildina, meðan møguleikar eru fyri víðari útbygging av skrivstovuhølum til tolldeildina og møguliga aðra nýtslu, tá autoverkstaðurin fer út, eins og framtíðar byggimøguleikar eisini eru til staðar.

Í verandi bygningi eru í ovaru hædd 244,6 m² og í núverandi verkstaðshædd 528 m².

Jórun í Dali, arkitektur, hevur kannað ognina og hevur tingast við býráðið um byggistig o.a.

Eftir hesum fyribilstingingum verður loyvt at byggja umleið 330 m² afturat í framtíðini. Góðir parkeringsmøguleikar vera eisini við bygningin.

Tó kann sigast, at húsini beinanvegin kunnu nýtast uttan stórvegis broytingar í ovaru hædd og innrætting av parti av verkstaðarhæddini til skrivstovur og harvið nøkta tørvin hjá tolldeildini í løtuni.

P/f Vilhelm Nielsen hevur boðið landsstýrinum ognirnar fyri tilsamans 9,1 mió. kr. Viðmerkjast skal, at ognin matr. nr. 620e var keypt í 1986 fyri 1,5 mió. kr.

Í upphæddini 11.000.000 kr. er roknað við keypsprísinum 9.100.000 kr. + innrætting beinanvegin av parti av verkstaðarhæddini, ætlandi um 200-250 m², soleiðis at samlaða nýtsluøkið beinanvegin kemur upp á 450-500 m², ið gevur møguleika fyri góðum skrivstovu- og avgreiðsluhølum, fundarhøli og matstovu.

Í tilboðnum treytar P/f Vilhelm Nielsen sær at fáa loyvi at leiga allan ella part av verkstaðnum í eitt styttri tíðarskeið, í mesta lagi 2 ár, meðan teir byggja nýggjan verkstað á øðrum meira hóskiligum stað.

Sí skjal 13

1. viðgerð 18. mars. Málið varð viðgjørt saman við nr. 54/1986: Keyp av húsaognum (landslæknahúsini) og nr. 32/1986: Keyp av húsaognum, sum vórðu beind í fíggjarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Hesi trý málini eru uppskot um at keypa húsaognir í Tórshavn til ávís endamál hjá tí almennu fyrisitingini, soleiðis sum tilskilað er í viðmerkingunum til tingmálið.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hesi mál og hevur hugt at húsaognunum, ið skotnar eru upp at keypa í løgtingsmáli nr. 105, »Húsaognir í Jónas Broncksgøtu«, meðan stundir ikki hava verið til at hyggja at hinum báðum ognunum, sum skotið er upp at keypa.

Í løgtingsmáli nr. 54/1986: Keyp av húsaognum (landslæknahúsini)
verður biðið um ..... 5 mió.
Í løgtingsmáli nr. 32/1986: Keyp av húsaognum í Tinganesi verður
biðið um ..... 4 mió.
Í løgtingsmáli nr. 105: Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu
verður biðið um ..... 11 mió.
tilsamans 20 mió.

Ásannandi tørviu mælir figgjarnevndin til, at henda saman við landsstýrinum fær heimild til at finna hóskandi høli møguliga við at byggja nýggj høli.
Ein samd nevnd setir fram í staðin fyri uppskot landsstýrisins soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Heimilað verður landsstýrinum saman við figgjarnevndini at byggja ella keypa hóskandi høli til almenna umsiting. Neyðugur peningur verður at útvega við eini cykajáttan.

2. viðgerð 14. apríl. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 32: Keyp av húsaognum og 54: Keyp av húsaognum (landslæknahúsini). § 1 varð samtykt við 22-0 atkvøðum, §§ 2 og 3 samtyktar við 22-0 atkvøðum. Við 21-0 atkvøðum varð samtykt at beina málini soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 303-7. Lóg nr. 31 frá 30. apríl 1987.

106 Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir

Ár 1987, mikudagin 18. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir sum broytt við løgtingslóg nr. 35 frá 21. mai 1975 verða hesar broytingar gjørdar:

1) Nýggj § 4 a) verður orðað soleiðis:

»Landsstýrið kann aftan á ummæli frá lønarráðnum avgera, at í eftirlønaraldrinum verður viðroknað tann tíð, ið tænastumaður átti aftan á at vera fyltur 25 ár, hevur verið sáttmálasettur innan tey í § 4, 1. stk. nevndu øki ella í eini kommunu ella einum koncessioneraðum felag.

2. stk. Fyri at fáa eftirlønaraldur eftir 1. stk. skal tænastumaður, tá ið hann varð sáttmálasettur, hava verið limur í góðkendum eftirlønarkassa, sum bæði hann og viðkomandi arbeiðsgevari hava goldið til, og at tað afturkeypsvirði, ið tilkemur honum, verður goldið í landskassan.

2) Nýggj § 4 b) verður orðað soleiðis:

»Landsstýrið kann aftan á ummæli frá lønarráðnum avgera, at tæn-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om tjenestemandspension

§ *1.*

I lagtingslov nr. 32 af 5. juli 1971 om tjenestemandspension, som ændret ved lagtingslov nr. 35 af 21. maj 1975 foretages følgende ændringer:

1) Ny § 4 a) affattes således:

»Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet bestemme, at der i pensionsalderen medregnes den tid, i hvilken en tjenestemand efter sit fyldte 25. år har været ansat på overenskomstvilkår indenfor de i § 4, stk. 1 nævnte område eller en kommune eller et koncessioneret selskab.

Stk. 2. Forhøjelse af pensionsalderen efter stk. 1 er betinget af, at tjenestemanden under sin ansættelse på overenskomstvilkår har været medlem af en godkendt pensionskasse, hvortil der er ydet bidrag af ham selv og vedkommende institution, og af, at der til landskassen sker overførsel af den tilbagekøbsværdi, der tilkommer ham af den hidtidige pensionsordning.

2) Ny § 4, b) affattes således:

»Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet bestem-

astumaður, sum, frammanundan at starvið er vorðið tænastumannastarv, hevur havt sama starv, og treytirnar í § 4 og 4 a) ikki eru loknar, kann fáa tiðina í hesum starvi aftan á 25. ár sítt taldu við í eftirlønaraldurin.«

3) § 26, 3. stk. verður orðað soleiðis:
»Eftirlønir eftir kapittul 7 verða frá 1. juli 1987 javnaðar eftir reglunum í 1. og 2. stk.

4) Nýtt kapittul 9 verður orðað soleiðis:
»Samskipanarfrádráttur.
§ 27. Tá eftirlønir verða útgoldnar eftir hesi lóg til persónar, sum fáa pensjón eftir lógunum um fólkapensjón og avlamispensjón, verður samskipanarfrádráttur gjørdur eftir reglunum í §§ 28-29.
2. stk. Til 1. januar 1989 verður gjørdur samskipanarfrádráttur fyri ta fólkapensjón, sum hjúnafelagin hjá eftirløntum tænastumanni fær útgoldna, jbr. § 28, 2. stk.
3. stk. Hjá samlivandi hjúnum, har bæði fáa tænastumannaeftirløn, verður samskipanarfrádráttur gjørdur í tænastumannaeftirløninni hjá hvørjum hjúnafelaga sær við grundarlagi í tí fólka- og avlamispensjón v.m., sum viðkomandi tænastumaður sjálvur fær útgoldna.
4. stk. Um ein hjúnafelagaeftirløn verur býtt millum fleiri, ið hava rætt til eftirløn, er samskipanarfrádráttarin fyri hvønn av hesum sami brotpartur av tí roknaða samskipanarfrádráttinum sum parturin av hjúnafelagaeftirløn.

me, at tjenestemand, som, forinden hans stilling blev tjenestemandsstilling, har haft samme stilling, og betingelserne i § 4 og 4 a) ikke er opfyldt, kan få medregnet den tid i pensionsalderen, i hvilken han efter sit 25. år har beklædt denne stilling.«

3) § 26, stk. 3 affattes således:
»Pensioner efter kapitel 7 reguleres fra den 1. juli 1987 efter reglerne i stk. 1 og 2.

4) Nyt kapitel 9 affattes således:
»Samordningsfradrag.

§ 27. Ved udbetaling af pension efter denne lov til personer, der får udbetalt pension i henhold til lov om folkepension og invalidepension, foretages samordningsfradrag efter reglerne i §§ 28-29.
Stk. 2. Indtil 1. januar 1989 foretages samordningsfradrag for den folkepension, som tjenestemandspensionistens ægtefælle får udbetalt, jvfr. § 28, stk. 2.
Stk. 3. For samlevende ægtefæller, der begge oppebærer tjenestemandspension, foretages samordningsfradrag i hver af ægtefællernes pension på grundlag af den folke- og/eller invalidepension m.v., som vedkommende tjenestemandspensionist selv får udbetalt.
Stk. 4. Såfremt en ægtefællepension deles mellem flere pensionsberettigede, udgør samordningsfradraget for hver af de pensionsberettigedes pension samme brøkdel af det beregnede samordningsfradrag, som andelen af ægtepensionen udgør.

§ 28. Hjá persónum, sum fáa fólkapensjón við fullari grundupphædd sambært § 3, 2. stk. í lóg fyri Føroyar um fólkapensjón, er frádrátturin fyri hvørt árs eftirlønaraldur, sum er lagdur til grund fyri útrokningini av tænastumannaeftirlønunum 2% av fólkapensjónsgrundupphæddini.

2. stk. Samskipanarfrádráttur fyri fólkapensjón hjá hjúnafelaga er fyri hvørt árs eftirlønaraldur, sum er lagdur til grund fyri útrokningina av tænastumannaeftirlønini 1½% av fólkapensjónsgrundupphæddini. Frádráttarprosentið verður 1. januar 1988 lækkað til 1%, og frá 1. januar 1989 dettur frádrátturin fyri fólkapensjón til hjúnafelagar burtur.

§ 28. For personer, som får udbetalt folkepension med fuldt grundbeløb efter § 3, stk. 2 i lov for Færøerne om folkepension, udgør fradraget for hvert års pensionsalder, som er lagt til grund for tjenestemandspensionens beregning 2% af folkepensionsgrundbeløbet.

Stk. 2. Samordningsfradraget for ægtefællens folkepension udgør for hvert års pensionsalder, som er lagt til grund ved tjenestemandens pensionens beregning 1½% af det udbetalte grundbeløb. Fradragsprocenten nedsættes fra 1. januar 1988 til 1%, og fra 1. januar 1989 bortfalder fradraget for ægtefællens folkepension.

§ 29. Hjá tænastumonnum, sum hava fingið uppsøgn við eftirløn eftir reglunum í § 2, 2. stk., smbr. §§ 7-8, og sum fáa pensjón eftir § 3, 2. stk. í lóg fyri Føroyar um avlamispensjón v.m., verður ein peningahædd svarandi til óarbeiðsførisviðbótina hjá støkum óarbeiðsførum avlamningum frádrigin. Sama er galdandi fyri persónar, sum fáa hjúnaeftirløn eftir reglunum í § 11, 2. stk., smbr. § 12, 2. stk., samstundis sum teir fáa avlamispensjón sambært § 3, 2. stk. í lóg fyri Føroyar um avlamispensjón v.m.

§ 29. Tjenestemænd, som afskediges med pension efter § 2, stk. 2, jvfr. §§ 7-8, og som oppebærer pension i henhold til § 3, stk. 2 i lov for Færøerne om invalidepension m.v., fradrages et beløb svarende til erhvervsudygtigheds beløbet for en. Det samme gælder for personer, der oppebærer ægtefællepension efter bestemmelse i § 11, stk. 2, jvfr. § 12, stk. 2, samtidig med pension i henhold til § 3, stk. 2 i lov for Færøerne om invalidepension m.v.

§ *2.*

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. § 28, 2. stk. hevur gildi frá 1. januar 1987.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft straks. § 28, stk. 2 har virkning fra 1. januar 1987.

Viðmerkingar:

Størvini hjá tænastumonnum landsins verða normerað sambært § 7 í løgtings

lóg nr. 37 frá 5. august 1971 um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumannastørvum. Hetta er tung mannagongd, og er lógin bert broytt tvær ferðir síðani 1971, í 1973, tá nøkur størv vórðu skipað á Føroya Sjómansskúla, og í 1984, tá tænastumannastørv, serliga leiðarastørv vórðu skipað innan fleiri øki.

Hetta saman við, at landsstýrið í 1970-unum ikki ynskti at seta tænastumenn, hevur ført við sær, at fólk, sum hava rokt sama starv í nógv ár og tí eru komin væl til árs, nú eru vorðin tænastumenn partvist orsakað av broytingini í lógini í 1984, og tí landsstýrið hevur sett fólk sum tænastumenn í tey normeraðu tænastumannastørvini.

Eftir § 4 í lógini um tænastumannaeftirlønir verður bert tíðin sum tænastumaður við einstøkum undantøkum tald við í eftirlønaraldrinum, t.v.s. at hesi fólk, sum í nógv ár hava rokt sama starv uttan eftirlønarrætt, men nústani eru vorðin tænastumenn, bert fáa eina lága eftirløn, tá tey fara frá, tí at árini sum tænastumaður verða so fá.

Tænastumannafelagið hevur fleiri ferðir reist málið um eftirlønaraldurin hjá einstøkum tænastumonnum yvirfyri landsstýrinum, men meta felagið og landsstýrið, at tað er betri at fáa eina generella heimild at geva tænastumanni haugri eftirlønaraldur enn at fara við einkultum persónum í løgtingið.

Landsstýrið skjýtur tí upp at broyta lógina soleiðis, sum skotið er upp, við at seta § 4 b aftrat. Hetta gevur landsstýrinum saman við lønarráðnum møguleika at geva hesum fólkum haugri eftirlønaraldur.

Eisini skjýtur landsstýrið upp, at útsett eftirløn verður javnað á sama hátt sum eftirlønirnar, sum er verður ein útsett eftirløn útroknað, tá tænastumaður fer úr starvi, og síðani verður hon ikki javnað. Tá tann fyrrverandi tænastumaðurin kemur til tann aldur, at hann hevur rætt at fáa eftirløn, er útsetta eftirlønin aloftast einki verd orsakað av lønar- og prishækkingum. Hetta verður roynt at bøta um við framlagda broytingaruppskotinum til § 26, 3. stk.

Ein spurningur, sum ofta hevur verið á lofti í seinastuni, er samskipanarfrádrátturin, og hevur Fólkaflokkurin lagt fram uppskot um, at samskipanarfrádrátturin verður avtikin, og er málið til viðgerðar í almannanevndini. Viðmerkjast kann, at málið hoyrir heima í fíggjarnevndini, tá talan ikki er um eina sosiala pensjón, men um ein lønarspurning hjá tænastumonnum.

Uppskotið hjá Fólkaflokkinum umfatar tænastumenn landsins, og eru teir ikki nógvir í tali. Vit hava ein annan stóran bólk av tænastumonnum, lærarunum, sum ganga eftir donsku tænastumannapensjónslógini.

Eftir hesi lóg, sum seinast er broytt í mai 1986, m.a. hvat samskipanarfrádrátt í viðvíkur, verður samskipanarfrádráttur hjá eftirløntum tænastumanni varðveittur, meðan hann so líðandi verður avtikin í fólkapensjónini hjá samlivandi hjúnafelagum, soleiðis at hann fellur burtur 1. januar 1990.

Landsstýrið metir ikki, tað er rætt at avtaka samskipanarfrádráttin fyri landsins tænastumenn og soleiðis eftirlønarliga stilla teir vel betur enn tænastumenn í fólkaskúlanum.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at samskipanarfrádráttur**in** verður varðveittur enn eina tíð framyvir, men at hann eins og í Danmark so líðandi verður avtikin fyri samlivandi hjúnafelagan hjá tænastumanni.

Annars verður vísst til viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Að § 1.1. Eftir galdandi lóg § 4, 2. og 3. stk. kann tænastumaður, um ávísar treytir eru loknar, fáa tíðina í starvi frammanundan talda við í eftirlønaraldrinum. Um tænastumaður frammanundan hevur verið sáttmálasettur við eftirlønartrygging, t.d. verkfrøðingasáttmálanum ella búskupar-/løgfrøðingasáttmálanum, er ikki møguleiki at fáa hesa tíð talda við í tænastumannaeftirlønaraldrinum, og er hann tí noyddur at hava tvær eftirlønir til sína tíð. Uppskotið ger, at sáttmálasett undir landi, kommunum og í serligum føløgum kunnu fáa aldurin við í tænastumannaaldrinum móti at gjalda afturkeypsvirðið av hinari eftirlønartryggingini í landskassanum.

Að § 1,2: Víst verður til tær generellu viðmerkingarnar til lógaruppskotið. Tá landsstýrið og lønarráðið skulu taka støðu til longdina av eftirlønaraldri, eigur serliga at verða ansað eftir, um viðkomandi er settur í starv sítt áðrenn ella aftan á 1971. Eftir lógini, ið var galdandi frammanundan 1971-lógini, rindaðu tænastumenn 5% av løn síni í eftirlønargrunn, og eru tey fólk, sum talan er um her, sloppin undan hesum. Ætlanin er tí, at tá ið eftirlønaralduin verður roknaður, verður § 4, 1. stk. fylgd, og at umrokning eftir § 34 ikki verður gjørd.

Að § 1,3: Víst verður til tær generellu viðmerkingarnar.

Að § 1,4: Samskipanarfrádráttur. Sum er verður samskipanarfrádráttur gjørdur hjá tænastumanni, frá tí hann fyllir 67 ár, líkamikið um hann ynskir at søkja um fólkapensjón ella ikki. Hetta verður nú broytt til, at bert um tænastumaður søkir um fólkapensjón, verður frádráttur gjørdur. Samskipanarfrádráttur fyri samlivandi hjúnafelaga fellur burtur í 1990. Vart verður gjørt við, at samskipanarfrádráttur bert verður avtikin fyri samlivandi hjúnafelaga, t.v.s. at fyri eftirlivandi hjúnafelaga við eftirløn verður eisini framyvir gjørdur fullur samskipanarfrádráttur.

Í galdandi lóg, har báðir hjúnafelagar fáa tænastumannaeftirløn, verður samskipanarfrádrátturin bert gjørdur í størru tænastumannaeftirlønini. Hetta verður nú broytt til, at samskipanarfrádrátturin verður gjørdur í báðum eftirlønunum í mun til, hvat hvør hjúnafelagi fær í sosialari pensjón.

Har fleiri skulu býta eina tænastumannaeftirløn, t.d. ein einkjumaður, har konan, sum var tænastumaður, hevur verið gift frammanundan og er fráskild, verður í løtuni fullur samskipanarfrádráttur gjørdur hjá báðum hjúnafelagum. Hetta verður eftir uppskotinum broytt soleiðis, at samskipanarfrádrátturin verður lækkaður við sama brotsparti, sum eftirløn er lækkað til.

§ 29, 1. stk. í galdandi lóg verður strikað, tí at hon er trupul at umsita og hevur lítlan og ongan praktiskan týdning.

§ 29, 2. stk. er óbroytt.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 13. mars 1987 og eftir 1. viðgerð 26. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Ein samd nevnd metir, at tað er óheppið, at starvsfólk í privatari vinnu ikki hava somu møguleikar í eftirlønarmálum sum alment sett, og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, punkt 1) in fine verður orðingin »kommunu ella einum koncessionerað um felag« broytt til: »kommunu, koncessioneraðum felag ella privatum vinnufelag«.	§ 1, punkt 1) in fine ændres formuleringen »kommune eller et koncessioneret selskab« til: »kommune, koncessioneret selskab eller privat erhvervsforetagende«.

Nevndin hevur síðani undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Signar Hansen, Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) mælir til at samtykkja allan hin partin av lógaruppskotinum.

Minnihutin (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við § 1, punkt 4 í uppskoti landsstýrisins og vísir til løgtingsmál nr. 55/1986 og setir sostatt fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður punkt 4 strikað.	I § 1 annulleres punkt 4.

2. viðgerð 10. apríl 1987. Broytingaruppskot frá figgjarnevndini til § 1 samtykt við 27-0-atkvøðum, § 1 soleiðis broytt varð samtykt við 27-0 atkvøðum, § 2 við 21-0 atkvøðum. Broytingarruppskot frá Anfinni Kallsberg afturtikið. Við 21-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 13. apríl. Málið endaliga samtykt við 27 0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 390-3-11. Lóg nr. 40 frá 5. mai 1987.

107 Endurgjald í sambandi við avtøku av furunkolosusmittaðum smolti

Ár 1987, mikudagin 18. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um endurgjald í sambandi við avtøku av furunkolosusmittaðum smolti.

lagtingslov om erstatning i forbindelse med aflivning af furunkolosesmittet smolt.

§ *1.*

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at nýta 4 mió. kr. til endurgjald í sambandi við avtøku av sjúkum smolti og fyribyrging móti, at sjúkan kemur fyri aftur, og at leggja peningin úr landskassanum.

§ *1.*

Landsstyret bemyndiges til at bruge 4 mio. kr. til erstatning i forbindelse med aflivning af syge smolt og forebyggende undersøgelser mod sygdom og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi, tá hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft ved dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Í juni 1986 kom tað upp, at smolt smittað við furunkolosu var latið sjóalarum. Eftir tilmæli frá djóralæknunum samtykti landsstýrið, at rættast var at gera eina roynd at basa smittuni.

Tað var greitt, at landsstýrið ikki hevði somu heimild viðvíkjandi alifiski sum viðvíkjandi húsdjórum á landi, t.e. at áleggja, at sjúk djór vórðu avtikin. Landsstýrið valdi tí at gera eina semju við teir alarar, sum høvdu sjúkt smolt. Semjan var smíðað eftir teimum reglum, sum eru í lóg um tiltøk móti smittuberandi sjúkum hjá húsdjórum. (Lóg nr. 36 frá 28. februar 1908 við seinni broytingum). Semjan er orðað soleiðis:

1. At heita á allar alarar, sum sjúkan er funnin hjá, um at gera tað ítasta fyri at basa smittuni, t.e. við at taka av allan fisk, sum av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er mettur at vera sjúkur av furunkolosu.
2. Um alararnir ganga við til hetta, er landsstýrið sinnað at leggja fyri løgtingið á ólavsøku uppskot um ein trygdargrunn, sum framyvir kann tryggja alarar, tá óhapp sum hesi henda, soleiðis at peningur skal latast í grunnin av vinnuni og av landsstýrinum, og skipað skal vera so fyri, at eisini teir alarar, sum eru komnir illa fyri av furunkolosu í juni 1986, fáa ávíst endurgjald. Til at meta um endurgjaldstørvin verður niðursett nevnd, har Havbúnaðarfelagið uppnevnir ein lim, landsstýrið ein lim og sorinskrivarin formannin.
3. Landsstýrið fer at heita á smoltbýtisnevndina at lata teir alarar, sum hava mist smolt vegna furunkolosu og tørvinum av at taka smolt av í 1986, fáa størri part av smoltinum í 1987. Eisini kunnu teir ráða yvir tí, sum er til taks av sjóbúnum sílum heystið 1986.
4. Landsstýrið leggur eisini fyri tingið á ólavsøku lóg um, hvussu farast skal fram, tá smitta frá illkynjaðum sjúkum kemur í alifisk.
5. Landsstýrið fyristílar, hvussu fram skal verða farið í royndini at basa smittuni nú í juni 1986.
6. Tann heilivágur, sum er komin til landið, verður bert at nýta til viðgerð av 2 ára smolti eftir fyristíling djóralæknans.

Tann metingarnevnd, sum varð niðursett, og sum er at samanbera við ta metingarnevnd, sum er umrødd í § 11 í omanfyri nevndu lóg um húsdjór og sjúkur, kom til ta niðurstøðu, at endurgjaldið fyri avtikna smoltið skuldi vera 3,64 mió. kr. Figgjarnevndin samtykti 20. januar 1987 at ganga umsóknini um endurgjald 3,64 mió. kr. á møti, treytað av at landsstýrið legði uppskot fyri løgtingið um heimild at rinda hetta endurgjald.

Aftarat hesum koma útreiðslur til at kanna smoltið, sum skal latast í 1987 fyri furunkolosu, so at ikki komið verður í somu støðu sum í fjør. Hesar eru av landsdjóralæknanum mettar til 300.000 til 340.000 kr.

Sostatt verður skotið upp, at løgtingið heimilar landsstýrinum at nýta 4,0 mió. kr. í sambandi við tilburðin av furunkolosu seinasta ár í juni og neyðugum fyribyrgjandi tiltøkum í hesum sambandi.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 27. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og m.a. útvegað sær upplýsingar frá djóralæknanum, ið er setttur til at viðgera fiskasjúkur.

Djóralæknin hevur upp á fyrispurning frá fíggjarnevndini upplýst, at orsøkirnar til, at sjúkan hevur tikið seg upp í Føroyum, eru helst tvær, nevniliga tann eina, at sjúkur fiskur frá sjógvi sunnanfyri er komin í Føroyaøkið, og sostatt hevur ein umfarsjúka breitt seg her. Onnur orsøkin, sum er undir kanning í løtuni í Føroyum, at fiskurin í Føroyum møguliga leingi hevur borið smittuna í sær, men er smittan ikki brotin sum verulig sjúka, fyrrenn ávísar stress- og umhvørvisumstøður hava ávirkað hetta.

Viðvíkjandi møguleikanum fyri, at smittan er komin inn sum bakteriur í fóðri ella flutningsplattum, má metast, at hesin møguleikin er sera lítil. Bakterian hevur vánaliga livilíkindi undir slíkum viðurskiftum.

Ein samd fíggjarnevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 9. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 26-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu, § 3 samtykt við 19-0 atkvøðum. Við 26-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. apríl. Málið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1509-3-5-2-2. Lóg nr. 47 frá 5. mai 1987.

108 Um at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 47 frá 10. mars 1965 »Om fragtaftaler ved international vejtransport m.v.« sum broytt við lóg nr. 645 frá 13. desember 1978

Ár 1987, hósdagin 26. mars legði løgtingsformaðurin vegna rættarnevndina fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum. Upp á fyrispurning frá ríkisumboðsmanninum heldur landsstýrið, at tað kann hava týdning, at lógin eisini fær gildi í Føroyum. Meðan rættarreglur leingi hava verið galdandi fyri flutning millum lond við skipi, jarnbreyt og flogfari, hava ikki verið skipað rættarviðurskifti fyri flutning eftir vegi við bili millum lond.

Málið varð sent rættarnevndini.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin heldur eins og landsstýrið, at tað í framtíðini kann hava týdning fyri føroyskt handilssamskifti við onnur lond, at eisini flutningur eftir vegi við bili kemur undir skipað rættarviðurskifti, sum byggja á sáttmála, sum varð undirskrivaður í Geneve 19. mai 1956.

Nevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins og setir fram fylgjandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 47 frá 10. mars 1965 »Om fragtaftaler ved international vejtransport m.v.« sum broytt við lóg nr. 645 frá 13. desember 1978, verður lýst at galda fyri Føroyar.

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Við 1. viðgerð hin 31. mars 1987 varð málið aftur beint í rættarnevndina,

Nevndin mælir tinginum til at samtykkja tað í fyrra áliti nevnda

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 47 frá 10. mars 1965 »Om fragtaftaler ved international vejtransport m.v.«, sum broytt við lóg nr. 645 frá 13. desember 1978, verður lýst at galda í Føroyum.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 10-14.

109 Um at lýsa sáttmála um stovnan av Norðurlendska Menningargrunninum fyri Útnorður at galda í Føroyum

Ár 1987, hósdagin 26. mars las løgtingsformaðurin soljóðandi skriv dagf. 23. oktober 1986 frá landsstýrinum:

»Ríkisumboðið hevur spurt, um sáttmáli um stovnan av Norðurlendska Menningargrunninum fyri Útnorður skal lýsast at galda fyri Føroyar.

Viðmerkjast skal, at Føroya Landsstýri er ein av undirskrivarunum av sáttmálanum. Sáttmálin varð undirskrivaður í Høfn týsdagin 19. august 1986.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við tilmæli um, at sáttmálin verður lýstur at galda í Føroyum.«

Sí skjal 15

1. viðgerð 27. mars 1987. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan orðaskifti.

2. viðgerð 31. mars. Uppskotið varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 11-46.

110 Um at seta í gildi í Føroyum Haag-sáttmálan frá 2. oktober 1973 um viðurkenning og fremjing av avgerðum um undirhaldsskyldu

Ár 1987, hósdagin 26. mars legði rættarnevndin fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðsmaðurin hevur biðið um viðmerkingar heimastýrisins til at seta í gildi í Føroyum Haag-sáttmálan frá 2. oktober 1973 um viðurkenning og fremjing av avgerðum um undirhaldsskyldu. Landsstýrið legði málið fyri rættarnevndina.

Málið snýr seg um eina viðkan av tí gamla Haag-sáttmálanum frá 15. september 1958 um viðurkenning og fremjing av avgerðum um undirhalds-

skyldu. Høvuðsinnihaldið er, at partarnir binda seg til at viðurkenna og fremja avgerðir, sum tiknar eru endaliga av kompetentum dømandi ella fyrisitingarligum myndugleika í einum av londunum, ið hava undirskrivað sáttmálan, um undirhaldsskyldu vegna skyldskap, hjúnaband og tílík viðurskifti.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og setir fram fylgjandi

uppskot

til

samtyktar

Haag-sáttmálin frá 2. oktober 1973 verður lýstur at gjalda í Føroyum.

Sí skjal 16

1. viðgerð 27. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 31. mars. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 522-1.

111 Um at seta í gildi í Føroyum §§ 2 og 3 í lóg nr. 326 frá 4. juni 1986 »Om ændring af adoptionsloven og indfødsretsloven«.

Ár 1987, hósdagin 26. mars legði rættarnevndin fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðsmaðurin hevur biðið um viðmerkingar heimastýrisins at seta nevndu broytingar í gildi í Føroyum. Broytingarnar skulu gera tað einfaldari hjá ættleiddum (adopteraðum) børnum at fáa danskan ríkisborgararætt, við tað at eitt útlendskt barn undir 12 ár, sum verður ættleitt, eftir at lógin er komin í gildi í Føroyum, av sær sjálvum fær danskan ríkisborgararætt, um barnið verður ætt-

leitt av donskum ríkisborgarum, og barnið býr í ríkinum saman við ættleiðingarforeldrunum.

Nevndin hevur havt samband við Lene Mikkelsen, fulltrúa á Ríkisumboðnum, sum dagliga umsitur ættleiðingarmál, og hevur fingið tilfar haðan.

Eftir teirri gomlu lógini, lóg nr. 495 frá 26. september 1984 - og sum enn er galdandi í Føroyum — kunnu børn undir 7 ára aldur ættleiðast bert úr Bangladesh, Finnlandi, India, Lýðveldinum Korea, Noregi, Filipsoyggjunum, Sri Lanka, Svøríki og Thailandi og straks fáa danskan ríkisborgararætt; ættleidd børn yvir 7 ár kunnu fáa henda rætt við »naturalisatión« eins og børn úr øllum øðrum londum (eisini tey undir 7 ára aldur).

Tann nýggja lógin gevur somu reglur fyri ættleiðing av børnum úr øllum londum; og øll ættleidd børn undir 12 ára aldur fáa av sær sjálvum danskan ríkisborgararætt.

Um talið á ættleiddum børnum úr øðrum londum til Føroya verður upplýst fyri nevndini, at í 1985 var tað 6, í 1987 7, meðan talið helst verður tvífaldað í 1987.

Við tað at nevndu broytingar umsitingarliga eru einfaldari og greiðari og hartil meira menniskjansligar — bæði hjá ættleiddum børnum og ættleiðingarforeldrum — er rættarnevndin samd um at mæla tinginum til, at tær verða settar í gildi í Føroyum og setir fram fylgjandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at §§ 2 og 3 í lóg nr. 326 frá 4. juni 1986 »Om ændring af adoptionsloven og indfødsretsloven« verða lýstar at galda í Føroyum.

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit II

Við 1. viðgerð hin 31. mars 1987 varð málið beint aftur í rættarnevndina. Nevndin mælir tinginum til at samtykkja tað í fyrra áliti nevnda

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at §§ 2 og 3 í lóg nr. 326 frá 4. juni 1986 »Om ændring af adoptionsloven og indfødsretsloven« verða lýstar at galda í Føroyum.

Við 1. viðgerð hin 31. mars 1987 varð málið beint aftur í rættarnevndina. Nevndin mælir tinginum til at samtykkja tað í fyrra áliti nevnda

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at §§ 2 og 3 í lóg nr. 326 frá 4. juni 1986 »Om ændring af adoptionsloven og indfødsretsloven« verða lýstar at galda í Føroyum.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskot til samtyktar varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

112 Avtøka av lóg um býti av rakstaravlopi landskassans

Ár 1987, týsdag 24. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býti av rakstaravlopi landskassans.	*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om fordeling af landskassens driftsoverskud.*
§ *1.*	§ *1.*
Løgtingslóg nr. 5 frá 25. januar 1973	Lagtingslov nr. 5 af 25. januar 1973 om

um býti av rakstraravlopi landskassans fer úr gildi.

§ 2.

Rakstraravlop landskassans fyri fíggjarárið 1986 verður at býta soleiðis:

30 mió. kr. í grunnin til berghols- og brúgvagerð,

85 mió. kr. í grunnin til effektivar veðhaldsbindingar,

90 mió. kr. í grunnin til endurnýggjing av skipaflotanum og

restin í kommunalan lánigrunn.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

fordeling af landskassens driftsoverskud ophæves.

§ 2.

Landskassens driftsoverskud for finansåret 1986 fordeles således:

30 mio kr. i fonden til tunnel- og brobygning,

85 mio. kr. i fonden til effektive garantiforpligtelser og

90 mio. kr. i fonden til fornyelse af skibsflåden og

resten i kommunal lånefond.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið heldur, at løgtingslóg nr. 5 frá 25. januar 1973 um býti av rakstraravlopi landskassans, har ⅓ fer í bergholsgrunn, ⅓ í grunnin til endurnýgging av skipaflotanum og ⅓ í landskassan, er vorðin ótíðarhóskandi.

Landsstýrið skjýtur tí upp at avtaka hesa lóg og býta yvirskot landskassans fyri fíggjarárið 1986, sum eftir fyribilstølum verður mett at koma at liggja um einar 280 mió. kr., við 30 mió. kr. í bergholsgrunnin, 85 mió. kr. í grunnin til effektivar veðhaldsbindingar, 90 mió. kr. í grunnin til endurnýgging av skipaflotanum og restina í ein kommunalan lánigrunn.

At 30 mió. kr. eru skotnar upp at leggja í bergholsgrunnin, er tí, at tað í fíggjarlógini fyri 1987 er roknað við eini upphædd av hesi støddi, stavandi frá rakstraravlopi landskassans frá 1986.

At 85 mió. kr. og 90 mió. kr. eru skotnar upp at játta í ávikavist grunnin til effektivar veðhaldsbindingar og grunnin til endurnýgging av skipaflotanum, er, tí at mett verður, at við hesum upphæddum verða hesir grunnar nøkulunda ajour við árslok 1987. Tað er eisini neyðugt fyri gjaldføri landskassans, at játtanin í hesar grunnar svarar til nýtsluna úr grunnunum.

Restin, sum í løtuni verður mett til einar 75 mió. kr., verður skotið upp at leggja í ein kommunalan lánigrunn. Nærri reglur verða at gera um henda grunn.

Tað er í løtuni ein kommunalur lánigrunnur, men hesin er lítil, og kann bert klára ein ógvuliga lítlan part av lánitørvi kommununna.

Tað verður skotið upp at seta henda grunn á stovn við tí fyri eyga at økja um innanlands fíggingina til kommunur, so undan slepst at taka so nógv uttanlandslán.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. mars 1987 og undir 1. viðgerð tann 26. í sama mánað beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) er av teirri áskoðan, at ikki er orsøk til at stovnseta nýggjan kommunalan lánsgrunn, men mælir til, at verandi kommunali lánsgrunnur verður varðveittur. Um neyðugt verður, má reglugerðin fyri henda grunnin broytast. Annars mælir nevndi meiriluti til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og tekur til eftirtektar, at fíggjarmálaráðharrin í fíggjarnevndini hevur upplýst, at ágóðin í kommunala lánsgrunninum skal setast sum innskot í útlendskum peningastovnum, og at likviditetur landskassan ongantíð hevur verið so gloður sum nú, og skuldin til Nationalbankan er goldin øll, og somuleiðis er eingin eftirstøða til Lønjavningargrunnin.

Sostatt setir meiriluti fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 2 verður orðingin: »og restin í kommunalan lánigrunn« broytt til: »og restin í kommunala lánsgrunnin«.	I § 2 ændres ordene »og resten i kommunal lånefond« til: »og resten i den kommunale lånefonden«.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til løgtingsmál nr. 51/1986: Broyting í løgtingslóg um býti av rakstraravlopi landskassans.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og vísir til løgtingsmál nr. 19/1986: Avtøka av løgtingslóg um býti av avlopi landskassans.

2. viðgerð 9. apríl. § 1 samtykt við 21-0, broytingaruppskot til § 2 samtykt við 19-0, § 2 soleiðis broytt samtykt við 17-0. § 3 samtykt við 19-0, og at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. apríl. Lógin endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 401-2-6. Lóg nr. 29 frá 30. apríl 1987.

113 Um at lýsa ST-sáttmálan frá 18. desember 1979 um avtøku av øllum háttum av mismuni ímóti kvinnum at galda í Føroyum

Ár 1987, hósdagin 26. mars legði rættarnevndin fram soljóðandi

Álit

Eftir fyrispurning frá ríkisumboðnum hevur landsstýrið lagt fyri tingið at taka støðu til at seta omanfyri nevnda sáttmála í gildi fyri Føroyar. Málið varð lagt fram hin 3. mars 1978 og varð latið rættarnevndini til viðgerðar. Rættarnevndin hevur viðgjørt málið.

Talan er um ST-mála, sum sambært § 27, 1. stk. í sáttmálanum kom í gildi hin 3. september 1981 — fyri Danmarkar viðkomandi hin 21. mai 1983.

Við grundarlag í sjálvum ST-sáttmálanum, ST—yvirlýsingini um mannarættindi og øðrum samtyktum og tilmælum, sum bera á tað borðið, binda partarnir seg til at taka av allan mismun móti kvinnum, har sovorðin mismunur enn verður gjørdur. 49 ST-limalond hava undirskrivað sáttmálan treytaleyst, meðan 18 lond hava tikið ávís fyrivarni.

Rættarnevndin heldur, at javnrættur kynjanna millum er sjálvsagdur partur av øllum fólkaræðisligum politikki og setir tí fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at ST-sáttmálin frá 18. december 1979 um avtøku av øllum háttum av mismuni ímóti kvinnum verður lýstur at galda í Føroyum.

1. viðgerð 27. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan orðaskifti.

2. viðgerð 31. mars. Uppskot landsstýrisins samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 10-2-15

114 løgtingslóg um manning av skipum

Ár 1987, fríggjadagin 27. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um manning av skipum.

Kapittul 1.

Orðskiftingar

§ 1. Lógin fevnir um føroysk skip.

§ 2. Í hesari lóg merkir:
1) »Stjórin«: Tann, ið Føroya Landsstýri setir at røkja hetta starv.
2) »Fiskiskip«: Eitt og hvørt skip, tá ið tjóðskaparbræv tess hevur havnarkenningar nummar.
3) »Handilsskip«: Eitt og hvørt skip, tá ið fiskiskip og stuttleikafør eru undantikin.
4) »Ferðamannaskip«: Skip, sum flytur meira enn 12 ferðafólk.
5) »Farmaskip«: Handilsskip og fiskiskip, sum ikki eru ferðamannaskip.
6) »Stuttleikafar«: Eitt skip, sum ikki verður nýtt til vinnuligt endamál. Er ivamál, avger skipaeftirlitið, um eitt skip skal metast sum stuttleikafar.
7) »Tons«: Skrásett tons brutto sum eina og hvørja tíð tilskilað í skipsins málibrævi ella máliprógvi, men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru. Hevur málibrævið ella máliprógvið 2 bruttoskrásetingartonsatøl, geldur størra talið.

løgtingslov om behandling af skibe.

Kapitel 1.

Definitioner m.v.

§ 1. Loven omfatter færøske skibe.

§ 2. I denne lov forstås ved:
1) »Direktøren«: Den, landsstyret ansætter i denne stilling.
2) »Fiskeskib«: Ethvert skib, hvis nationalitetsbevis er forsynet med havnekendingsnummer.
3) »Handelsskib«: Ethvert skib med undtagelse af fiskeskibe og fritidsfartøjer.
4) »Passagerskib«: Et skib, der befordrer flere end 12 passagerer.
5) »Lastskib«: Et handelsskib og fiskeskib, der ikke er et passagerskib.
6) »Fritidsfartøj«: Et skib, der ikke anvendes til erhvervsmæssige formål. I tvivlstilfælde afgør skibstilsynet, om et skib kan anses for et fritidsfartøj.
7) »Tons«: Registertons brutto som til enhver tid i skibets målebrev eller målebevis angivet, idet eventuelle decimaler bortkastes. Indeholder målebrevet eller målebeviset 2 bruttoregistertonnager, da den største af disse.

8) »Framtøkumegi«: Øll tann samanlagda megin í kilowatt (kW), men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru, við støðuga gongd á øllum maskinum, sum samstundis kunnu dríva skiplð fram. Orkan verður ásett grundað á royndarflatutalvuna hjá motorverksmiðjuni, og verður hon at seta í siglingarloyvisbrævið og manningarskjalið.

9) »Strandasigling«: Sigling, meðan fráleikin er ikki meir enn 30 fjórðingar frá føroysku strondini (grundlinjuni).

10) »Heimasigling«: Sigling meðan fráleikin er ikki meiri enn 200 fjórðingar frá føroysku strondini (grundlinjuni).

11) »Altjóða sigling«: Sigling uttan fyri strandasigling og heimasigling.

§ 3. Á øllum skipum skal vera skipari og harafturat so mikil manning, sum tørvur er á til at tryggja mannalív á sjónum.

8) »Fremdrivningseffekt«: Den samlede maksimale ydelse i kilowatt (kW), idet eventuelle decimaler bortkastes, ved kontinuerlig drift af alt maskineri, som samtidig kan fremdrive skibet. Ydelsen ansættes på basis af motorfabrikantens prøveplansskemaer og indføres i fartstilladelsen og besætningsfastsættelsen.

9) »Kystfart«: Fart i en afstand af ikke over 30 sømil fra den færøske kyst (basislinien).

10) »Nærfart«: Fart i en afstand af ikke over 200 sømil fra den færøske kyst (basislinien).

11) »International fart«: Fart udenfor kystfart og nærfart.

§ 3. På ethvert skib skal der være en skibsfører, ligesom der herudover skal være den af hensyn til sikkerhed for menneskeliv på søen nødvendige besætning.

Kapittul 2
Fiski- og handilsskip.

§ 4. Fyri ferðamannaskip uttan mun til stødd, fyri farmaskip til støddar 20 tons og størri og fyri farmaskip minni enn 20 tons uttan fyri strandasigling setir stjórin manningina. Fyri farmaskip minni enn 20 tons í strandasigling kann stjórin áseta manningina, um so er, at atlitið til trygdina fyri mannalívum á sjónum ger hetta neyðugt.

Kapitel 2
Fiskeskibe og handelsskibe.

§ 4. For passagerskibe uanset størrelse, for lastskibe på 20 tons og derover og for lastskibe under 20 tons uden for kystfart fastsættes besætningen af direktøren. For lastskibe under 20 tons i kystfart kan direktøren fastsætte besætningen, såfremt hensynet til sikkerheden for menneskeliv på søen gør det påkrævet.

2. stk. Manningin verður ásett fyri hvørt skipið sær við atliti til slag av skipi, innrætting, útbúnað, nýtslu og siglingarleið, so at manningin er slík til nøgd og samanseting, at alt arbeiði fæst gjørt, sum týdning hevur fyri tryggleikan hjá skipi og teimum, sum eru umborð, eitt nú:

1. at halda dygga brúgva- og maskinvakt,
2. at nýta og umsita bjargingarambað,
3. at nýta og umsita útgerð til sjóskaðaansingar, eldsløkkingar og samskiftingar,
4. at halda við líka og halda veint tað, sum aðramáta viðvíkir tryggleikanum,
5. at leggja skipið fyri teym ella við bryggju,
6. at matgera og hava heilsuatstøður í lagi.

3. stk. Við áseting av manningini skal afturat atlit verða havt til vaktarskipanina umborð, til liðarbeiði, til veruligu arbeiðstíðina hjá teimum einstøku starvsbólkunum, til galdandi reglur um hvíldartíð til eindarmanningarskipan og somuleiðis til tørvin á útbúgvingarstørvum.

Stk. 2. Besætningen fastsættes for hvert enkelt skib under hensyn til skibets type, indretning, udstyr, anvendelse og fartsområde, således at besætningens størrelse og sammensætning gør det muligt at dække alle opgaver af betydning for skibets og de ombordværendes sikkerhed, herunder

1) opretholdelse af sikker bro- og maskinvagt,
2) betjening og vedligeholdelse af redningsmidler,
3) betjening og vedligeholdelse af havarikontrol-, brandslukknings og kommunikationsudstyr,
4) anden vedligeholdelse og rengøring af sikkerhedsmæssig art,
5) fortøjningsopgaver,
6) kostforplejning og sundhedsforhold.

Stk. 3. Ved fastsættelsen af besætningen skal der endvidere lages hensyn til vagtordningen om bord, til holddrift, til de enkelte besætningsgruppers faktiske arbejdstid, til gældende hviletidsbestemmelser, til anvendelse af enhedsmandskab samt til behovet for uddannelsesstillinger.

§ 5. Deks- og maskinmanning skal lúka tey útbúgvingarkrøv, sum sjóvinnulógin setir til mynstringar, sum ófulltikin matrósur (dekkari) ella fulltikin matrósur (dekkari) ávikavist ófulltikin motormaður ella fulltikin motormaður.
2. stk. Eindarmanning skal lúka tey útbúgvingarkrøv, sum sjóvinnulógin setir til mynstringar sum ófulltikin skipsatstøðari ella fulltikin skipsatstøðari.

§ 5. Dæks- og maskinmandskab skal opfylde de i sønæringsloven foreskrevne uddannelseskrav for udmønstring som ubefaren matros (dækker) eller befaren matros (dækker) henholdsvis ubefaren motormand eller befare motormand.
2. stk. Enhedsmandskab skal opfylde de i sønæringsloven foreskrevne uddannelseskrav for udmønstring som ubefaren skibsassistent eller befaren skibsassistent.

3. stk. Við manningaráseting kunnu persónar verða roknaðir uppí, sum hava aðra útbúgving, tá verður at javnmeta við tá, sum sjóvinnulógin fyriskrivar.

§ 6. Skiparar, brúgva- og maskinyvirmenn skulu hava sjóvinnubrøv ella útbúgving sambært niðanfyri standandi talvum. Har sum fleiri førleikamøgu leikar eru nevndir, ásetir stjórin førleikakravið.

2. stk. Persónur við dugnaskaparbrævi í motorpassing, sum verður kravdur, kann um somu tíð verða skipaður í annað starv umborð.

3. stk. Stjórin kann, tá talan er um fiskiskip, gera frávik frá teimum krøvum, sum í hesari lóg eru sett um sjóvinnubrævakrøv sum ávikavist skipari, yvirstýrimaður ella stýrimenn annars og krevja í staðin fyri sjóvinnubrøv sum skipari, heimaskipari, stýrimaður á 3. ella 4. stigi ella dugnaskaparbræv.

4. stk. Á fiskiførum uppá 20 tons og støri við framtøku uppá 100 KW og meira áseting stjórin manningina.

Stk. 3. I besætningsfastsættelsen kan indgå personer med anden uddannelse, der kan ligestilles med de i sønæringsloven foreskrevne.

§ 6. Skibsførere, navigations- og maskinofficerer skal have sønæringsbevis eller uddannelse i overensstemmelse med nedenstående skemaer. Hvor flere kvalifikationsmuligheder er anført, fastsætter direktøren kvalifikationskravet.

Stk. 2. I tilfælde, hvor en person med dueligheds bevis i motorpasning foreskrives, kan denne samtidig være ansat til anden tjeneste om bord.

Stk. 3. Direktøren kan for fiskeskibe gøre undtagelse fra de krav, der i denne lov er fastsat om krav til sønæringsbeviser som henholdsvis skibsfører, overstyrmand eller styrmand iøvrigt og kræve i stedet sønæringsbevis som skipper, kystskipper, styrmand af 3. eller 4. grad eller dueligheds bevis.

Stk. 4. For fiskeskibe på 20 tons og derover med fremdrivningsmaskine på 100 kW og derover, fastsættes maskinbesætningen af direktøren.

Fiskiskip og handilsskip

Skiparar og stýrimenn

Siglingarøki	Strandasigling (30 fjørðingar)			Heimasigling (200 fjørðingar)			Altjóða sigling		
Tons	Skiparar	Yvirstýrimað.	Hinir stýrimenn.	Skipari	Yvirstýrimað.	Hinir stýrimenn.	Skipari	Yvirstýrimað.	Hinir stýrimenn.
20-99	Dugnaskaparbrævi sigling	Dugnaskaparbrævi sigling		Heimaskipari	Stýrimaður við dugnaskaparbrævi í sigling		Skipari	Stýrimaður á ¾ stigi	
100-199	Heimaskipari	Stýrimaður á 4. stigi		Heimaskipari	Stýrimaður á 4. stigi		Skipari	Stýrimaður á 3. stigi	
200-799	Heimaskipari	Stýrimaður á 4. stigi		Skipari	Stýrimaður á 3. stigi		Skipari	Stýrimaður á 3. stigi	
800-1599	Skipsførari	Stýrimaður á 2. stigi	Stýrimaður á ¾ stigi	Skipsførari	Stýrimaður á 2. stigi	Stýrimaður á ¾ stigi	Skipsførari	Stýrimaður á 2. stigi	Stýrimaður á ¾ stigi
1600 og størri	Skipsførari	Stýrimaður á 1. stigi	Stýrimaður á 2. stigi	Skipsførari	Stýrimaður á 1. stigi	Stýrimaður á ¾ stigi	Skipsførari	Stýrimaður á 1. stigi	Stýrimaður á 2. stigi

Maskinmeistarar og motorpassarar

Siglingarøki	Heimasigling (30 fjørðingar)			Navnagrannasigling (200 fjørðingar)			Altjóða sigling		
Framtøkumegi (kW)	Maskinstjóri	1. maskinmeistari	Hinir maskinmeistarnir	Maskinstjóri	1. maskinmeistari	Hinir maskinmeisterarnir	Maskinstjóri	1. maskinmeistari	Hinir maskinmeistarnir
100-449	Dugnaskaparbrævi motorpassing			Dugnaskaparbrævi motorpassing			Motorpassari		
450-749	Motorpassari			Motorpassari			Motorpassari	Motorpassari	
750-1499	Maskinmeistari á 2. stigi	Maskinmeistari á 3. stigi skip-maskinistur		Skipsmaskinmeistari á 2. stigi	Skipsmaskinmeistari á 3. stigi skipsmaskinistur		Skipsmaskinmeistari á 2. stigi	Skipsmaskinmeistari á 3. stigi skipsmaskinistur	
1500-2999	Skipsmaskinmeistari á 2. stigi	Skipsmaskinmeistari á 2. stigi	Skipsmaskinmeistari á ¾ stigi, ella maskinmeistari, sum hevur staðið maskinmeistaraprógv	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi	Skipsmaskinmeistari á 2. stigi	Skipsmaskinmeistari á ¾ stigi, ella maskinmeistari, sum hevur staðið maskinmeistaraprógv	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi	Skipsmaskinmeistari á 2. stigi	Skipsmaskinmeistari á ¾ stigi, ella maskinmeistari, sum hevur staðið maskinmeistaraprógv
3000 og størri	Skipsmaskinstjóri	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi		Skipsmaskinstjóri	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi		Skipsmaskinstjóri	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi	

Fiskeskibe og handelsskibe
Skibsførere og styrmænd

Fartsområde		Kystfart (30 sømil)		Nærfart (200 sømil)			International fart		
Tons	Skibsfører	Overstyrm.	Øvrige styrm.	Skibsfører	Overstyrm.	Øvr. styrmænd	Skibsfører	Overstyrmand	Øvr. styrmænd
20-99	Dueligheds-bevis i sejlads	Dueligheds-bevis i sejlads		Kystskipper	Styrmand med dueligheds-bevis i sejlads		Skipper	Styrmand af 4. grad	
100-199	Kystskipper	Styrmand af 4. grad		Kystskipper	Styrmand af 4. grad		Skipper	Styrmand af 3. grad	
200-799	Kystskipper	Styrmand af 4. grad		Skipper	Styrmand af 3. grad		Skipper	Styrmand af 3. grad	
800-1599	Skibsfører	Styrmand af 2. grad	Styrmand af 3. grad	Skibsfører	Styrmand af 2. grad	Styrmand af 3. grad	Skibsfører	Styrmand af 2. grad	Styrmand af 3. grad
1600 og derover	Skibsfører	Styrmand af 1. grad	Styrmand af 2. grad	Skibsfører	Styrmand af 1. grad	Styrmand af 3. grad	Skibsfører	Styrmand af 1. grad	Styrmand af 2. grad

Maskinmestre og motorpassere

Fartsområde	Kystfart (30 sømil)			Nærfart (200 sømil)			International fart		
Fremdrivelsesanlæg (kW)	Maskinchef	1. maskinmester	Øvrige maskinmestre	Maskinchef	1. maskinmester	Øvrige maskinmestre	Maskinchef	1. maskinmester	Øvrige maskinmestre
300-449	Dueligheds-bevis i motorpasning			Dueligheds-bevis i motorpasning			Motorpasser		
450-749	Motorpasser			Motorpasser			Motorpasser	Motorpasser	
750-1499	Maskinmester af 2. grad	Maskinmester af 3. grad, skibsmaskinist		Skibsmaskin-mester af 2. grad	Skibsmaskinmester af 3. grad, skibsmaskinist		Skibsmaskin-mester af 2. grad	Skibsmaskinmester af 3. grad, skibsmaskinist	
1500-2999	Skibs-maskin-mester af 2. grad	Skibsmaskin-mester af 2. grad	Skibs-maskin-mester af 3. grad, eller	Skibsmaskin-mester af 1. grad	Skibsmaskin-mester af 2. grad	Skibsmaskin-mester af 3. grad, eller	Skibsmaskin-mester af 1. grad	Skibsmaskin-mester af 2. grad	Skibsmaskin-mester af 3. grad, eller
3000 og derover	Skibsmaskin-chef	Skibsmaskin-mester af 1. grad	maskinmester med bestået maskinmester-eksamen	Skibsmaskin-chef	Skibsmaskin-mester af 1. grad	maskinmester med bestået maskinmester-eksamen	Skibsmaskin-chef	Skibsmaskin-mester af 1. grad	maskinmester med bestået maskinmester-eksamen

5. stk. Tá stjórin ásetir manningina á fiskiskipum, skal verða gingið eftir § 4, 2. stk.

§ *7.* Á skipum, sum sambært galdandi fyriskipanum skal hava radiofjarritara- ella radiotelefonstøð, skal til at passa hesa verða settur ávikavist skipsradiofjarritari ella skipsradiotelefonistur við fyriskrivaðum vinnubrævi.

§ *8.* Fyriskipaður kokkur ella hovmeistari skal hava vinnubrævv sum skipskokkur.

§ *9.* Fyri ferðamannaskip kann stjórin økja ella minka um tey førleikakrøv, sum § 6 setir við atliti til innrætting, útbúnað, siglingarleið og ferðamannatal á skipum.

§ *10.* Skip til støddar 20 tons og størri, so eisini skip í altjóða sigling skulu hava prógvskjal, sum stjórin gevur út, har manningarásetingin er til skjals.
2. stk. Fyri skip til støddar minni enn 20 tons í strandasigling kann manningin verða ásett fyri bólkar av skipum, og í staðin fyri at skriva prógv sum tilskilað kann verða fráboðað um ásetingina við kunngerð.

Stk. 5. Når direktøren fastsætter besætningen på fiskeskibe, skal § 4, stk. 2, iagttages.

§ *7.* På skibe, der efter gældende forskrifter skal være udstyret med radiotelegraf- eller radiotelefonstation, skal der til betjening heraf være ansat henholdsvis skibsradiotelegrafist eller skibsradiotelefonist med foreskrevet bevis.

§ *8.* En foreskreven kok eller hovmester skal have bevis som skibskok.

§ *9.* For passagerskibe kan direktøren forøge eller formindske de i § 6 anførte kvalifikationskrav under hensyn til skibets indretning, udstyr, fartsområde og passagerantal.

§ *10.* Skibe på 20 tons og derover samt skibe i international fart skal være forsynet med et af direktøren udstedt certifikat indeholdende besætningsfastsættelse.
Stk. 2. For skibe under 20 tons i kystfart kan besætningen fastsættes for grupper af skibe, og i stedet for udstedelse af certifikat som omhandlet i stk. 1. kan meddelelse om fastsættelsen gives ved bekendtgørelse.

Kapittul 4
Stuttleikafør

§ *11.* Á stuttleikaførum til støddar 20 tons og størri, men minni enn 100 tons, skal vera skipari og stýrimaður við sjóvinnubrævi samsvarandi niðanfyri standandi talvu:

Kapitel 4
Fritidsfartøjer

§ *11.* I fritidsfartøjer på 20 tons og derover, men under 100 tons, skal der være skibsfører og styrmand med sønæringsbevis i overensstemmelse med nedenstående skema:

Siglingarøki	Skipari	Stýrimaður
Heimasigling	Dugnaskaparbrævi í sigling	Dugnaskaparbrævi í sigling
Altjóða sigling	Heimaskipari	Dugnaskaparbrævi í sigling

Fartsområde	Skibsfører	Styrmand
Nærfart	Dueligheds-bevis i sejlads	Dueligheds-bevis i sejlads
International fart	Kystskipper	Dueligheds-bevis i sejlads

2. stk. Fyri stuttleikaför til støddar 100 tons og størri ásetir stjórin manningina.

3. stk. Til at passa maskinuna á stuttleikaførum til støddar 20 tons og størri við framtøkumaskinu til støddar 100 kW og størri, men minni enn 600 kW, skal, tá ið maskinan kann verða stillað og skrúvustýring fara fram frá róðurplássinum, í heimasigling vera 1 persónur við dugnaskaparbrævi í motorpassing og uttan fyri nevndu sigling 2 persónar við dugnaskaparbrævi í motorpassing. Fyri onnur stuttleikaför til støddar 20 tons og størri við framtøkumaskinu til støddar 100 kW og størri ásetir stjórin maskinmanningina.

4. stk. Tá ið stjórin sambært 2. og 3. stk. ásetir manningina, skal verða gingið eftir § 4, 2. stk.

5. stk. Landsstýrið kann áseta førleikakrøv til skiparar á stuttleikaførum til støddar minni enn 20 tons og krøv til maskinmanning á slíkum førum.

Stk. 2. For fritidsfartøjer på 100 tons og derover fastsættes besætningen af direktøren.

Stk. 3. Til betjening af maskinen i fritidsfartøjer på 20 tons og derover med fremdrivningsmaskineri på 100 kW og derover, men under 600 kW, i hvilke maskinen kan reguleres og skruemanøvrer foretages fra styrepladsen, skal der i nærfart være 1 person med dueligheds-bevis og motorpasning og uden for denne fart 2 personer med dueligheds-bevis i motorpasning. For øvrige fritidsfartøjer på 20 tons og derover med fremdrivningsmaskineri på 100 kW og derover fastsættes maskinbesætningen af direktøren.

Stk. 4. Når direktøren i henhold til stk. 2 og 3 fastsætter besætningen, skal § 4, stk. 2, iagttages.

Stk. 5. Landsstyret kan fastsætte kvalifikationskrav til skibsførere af fritidsfartøjer under 20 tons samt krav til maskinbesætningen i sådanne skibe.

Kapittul 5
Vanligar fyriskipanir.

§ *12.* Ein og hvør, sum verður settur í starv umborð, sum henda lóg fevnir um, skal hóka tey útbúgvingarkrøv, sum ásett eru í ella sambært sjóvinnulógini. Eisini skulu krøv, sum ásett eru í ella sambært hesari lóg, verða lokin.
2. stk. Stjórin kann við áseting av manningini fyriskipa, at persónur, sum settur verður í starv, har sum sjóvinnulógin ikki ásetir krøv um serliga útbúgving, áðrenn tænastan byrjar, skal hava tikið lut í einum trygdarskeiði, sum landsskúlafyrisitingin fyriskipar.
3. stk. Stýrimaður ella maskinmeistari, sum settur verður út um ásetta talið, skal ikki verða havdur til sjálvstøðuga vakt, uttan su at hann hevur sjóvinnubræv í minsta lagi á sama stigi, sum kravt er fyri starv sum lægsti stýrimaður ella lægsti maskinmeistari á skipinum.

§ *13.* Missir skip nakað av fyriskipaðu manning síni av sjúku, deyða, rýming ella aðruri orsøk, sum skipari ella reiðari hava ikki ábyrgd av, tá skulu krøv ásett í ella sambært hesi lóg ikki forða, at skiparin við umhugsni um sjódyggleika skipsins heldur fram ferðina. Manningin skal tó skjótast til ber fáast upp á fult tal aftur. Skiparin skal føra inn frágreiðing um hesi viðurskifti í skipsdagbókina, ella, um skipsdagbók verður ikki førd, í eftirlitsbókina.

Kapitel 5
Almindelige bestemmelser.

§ *12.* Enhver, der ansættes om bord i en stilling, der er omfattet af denne lov, skal opfylde de uddannelseskrav, der er fastsat i eller i medfør af søfartsloven. Endvidere skal krav, der er fastsat i eller i medfør af denne lov, være opfyldt.
Stk. 2. Direktøren kan ved en fastsættelse af besætningen foreskrive, at personer, der ansættes i stilling, for hvilken der ikke i søfartsloven er fastsat særlige uddannelseskrav, skal have gennemgået et af undervisningsdirektoratet godkendt sikkerhedskursus, forinden tjenesten tiltrædes.
Stk. 3. En styrmand eller maskinmester, der ansættes ud over det fastsatte antal, må ikke benyttes til selvstændig vagt, medmindre den pågældende er i besiddelse af søfartsbevis af mindst samme grad som fastsat for den laveste af de for skibet foreskrevne stillinger henholdsvis for styrmænd og maskinmestre.

§ *13.* Hvis et skib mister nogen del af den foreskrevne besætning som følge af sygdom, død, rømning eller andre skibsføreren eller rederiet utilregnelige årsager, skal krav fastsat i eller i medfør af denne lov ikke være til hinder for, at skibsføreren under fornøden hensyntagen til skibets sødygtighed kan fortsætte rejsen. Besætningen skal dog snarest muligt kompletteres. Skibsføreren skal om forholdet indføre fornøden bemærkning i skibsdagbogen, eller, hvor skibsdagbog ikke føres, i tilsynsbogen.

§ *14.* Føroya landsstýri kann eftir tilmæli frá reiðara og sjónannafelagunum broyta tey tonsamark, sum sett eru í skrásetingartonsum brutto til mark sett í aðrari málieind, men skal tá verða ansað eftir, at slík nýggj mark so væl sum til ber svara til tær skipastøddir, sum tonsamarkini greina.

2. stk. Til tann dag, ið nýggj mark, sum nevnd í 1. stk., eru ásett, verður manningin á skipum, sum ikki eru máld í skrásetingartonsum brutto, ásett eftir bruttotonsatali skipsins, sambært løgtingslóg um skipauppmáling, og ger stjórin av í hvørjum føri, hvat bruttoskrásetingarøki skipið skal hoyra til sambært § 6, 1. stk.

§ *15.* Stjórin kann ansandi § 4, 2. stk., økja ella minka førleikakrøvini í lógini og manningarreglurnar fyri skip, tá ið umstøður eru serstakar, fyri serskip og skip við serligum byggiháttum ella við serligum útbúnaði og somuleiðis fyri skip, sum nýtt verða á landafrøðiliga avmarkaðum siglingarleiðum.

2. stk. Haraftrat kann stjórin í serligum umstøðum og ansandi bindandi altjóða samtyktum loyva, at persónur verður havdur í starvi, tó at hann hevur ikki slíkt vinnubræv, sum krevst í starvinum, men bara fyri einstaka ferð ella fyri ávíst tíðarbil, sum ikki skal vera longri enn 6 mánaðir.

§ *16.* Stjórin ásetir eftir áheitan manningina fyri skip, sum byggjaetlan er

§ *14.* Landsstyret kan efter samråd med redernes og de søfarendes organisationer ændre de i loven indeholdte tonnagegrænser anført i registertons brutto til grænser fastsat ved anden måleenhed. Det skal dog herved tilstræbes, at sådanne nye grænser så vidt muligt svarer til de skibsstørrelser, som de i loven anførte tonnagegrænser er udtryk for.

Stk. 2. Indtil det tidspunkt, hvor nye grænser som omhandlet i stk. 1 er indført, fastsættes besætningen i skibe, hvis bruttoregistertonnage ikke er målt, på grundlag af skibets bruttotonnage målt i henhold til lagtingslov om skibsmåling, således at direktøren i de enkelte tilfælde afgør, i hvilket bruttoregistertonnageområde skibet henhører, i henhold til § 6, stk. 1.

§ *15.* Direktøren kan under iagttagelse af § 4, stk. 2, forøge eller formindske lovens kvalifikationskrav og besætningsregler for skibe, hvor særlige forhold gør sig gældende, for specialskibe og skibe af særlig konstruktion eller med særligt udstyr samt for skibe, der anvendes i et geografisk begrænset fartsområde.

Stk. 2. Endvidere kan direktøren under særlige omstændigheder og under iagttagelse af bindende internationalt vedtagne bestemmelser tillade, at en person, der ikke er i besiddelse af det for den pågældende stilling krævede bevis, anvendes i sådan stilling, dog kun for en enkelt rejse eller for et bestemt tidsrum af ikke over 6 måneder.

§ *16.* Direktøren fastsætter efter anmodning besætningen for et projekte-

gjørd fyri, og fyri útlendskt skip, sum ætlanin er at føra undir føroyskt flagg (undanáseting).

2. stk. Metir stjórin, at ein undanáseting fæst ikki gjørd á nóg tryggan hátt, verður áheitanin víst aftur við neyðugari grundgeving.

3. stk. Ein undanáseting møguliga broytt við kæru til sjóvinnuráðið — er bindandi, uttan so at broyting hevur verið í teimum fyritreytum, sum hava verið avgerandi fyri ásetingina.

ret skib samt for et udenlandsk skib, der agtes overført til færøsk flag (forhåndsfastsættelse).

Stk. 2. Finder direktøren, at en forhåndsfastsættelse ikke med fornøden sikkerhed kan foretages, afvises anmodningen med fornøden begrundelse.

Stk. 3. En forhåndsfastsættelse — eventuelt ændret ved indbringelse for søfartsrådet - - har bindende virkning, medmindre der er sket ændringer i de forudsætninger, der har været afgørende for fastsættelsen.

§ 17. Avgerðir, sum stjórin hevur tikið sambært hesi lóg, kunnu avvarðandi reiðarí ella sjómannafeløg leggja fyri sjóvinnuráðið, og tekur tað endaligu fyrisitingarligu avgerðina.

2. stk. Avgerð, sum vísir seg frá áheitan um undanáseting, kann tó ikki verða løgd fyri ráðið.

3. stk. Er undanáseting stjórans ikki, áðrenn ein mánaður er gingin, løgd fyri ráðið, kann avgerð um endaligu manningarskrásetingina samsvarandi undanásetingini ikki verða løgd fyri ráðið, uttan broytingar hava verið í teimum fyritreytum, sum vóru avgerandi fyri ásetingina.

4. stk. Í sjóvinnuráðnum situr formaður, sum skal vera løgfrøðingur, ið Føroya Landsstýri tilnevnir, og eitt umboð fyri hvørt av sjómannafeløgunum, eins og nógv umboð fyri reiðarafeløgini, allir tilnevndir av Føroya Landsstýri eftir tilmæli frá avvarðandi feløgum. Fyri hvønn lim verður tilnevndur ein eykalimur.

§ 17. Afgørelser truffet af direktøren i henhold til denne lov kan af vedkommende rederi eller søfarendes organisation indbringes for søfartsrådet, der træffer den endelige administrative afgørelse.

Stk. 2. En afgørelse, der går ud på afvisning af en forhåndsfastsættelse, kan dog ikke indbringes for rådet.

Stk. 3. Når en af direktøren foretaget forhåndsfastsættelse ikke inden 1 måned har været indbragt for rådet, kan en afgørelse om den endelige besætningsfastsættelse i overensstemmelse med forhåndsfastsættelsen kun indbringes for nævnet, når der er sket ændringer i de forudsætninger, der har været afgørende for fastsættelsen.

Stk. 4. Søfartsrådet består af en af landsstyret udpeget formand, der skal være jurist, samt en repræsentant for hver af de søfarendes organisationer og et tilsvarende antal repræsentanter for redernes organisationer, der alle udnævnes af landsstyret efter indstilling fra de pågældende organisationer. For hvert af medlemmerne udnævnes stedfortrædere.

5. stk. Føroya Landsstýri ásetir reglur um málsviðgerðina í nevndini.

§ *18.* Við sekt verður hann revsaður, sum brýtur § 3, § 5, 1. og 2. stk., § 6, 1., 3. og 4. stk., § 7, § 8, § 10, 1. stk., § 11, 1. og 3. stk., § 12, 1. og 3. stk., og § 13, 2. og 3. pkt., ella brýtur tær manningarásetingar, sum eru gjørdar sambært hesari lóg.

2. stk. Í fyriskipanum, sum ásettar verða sambært § 11, 5. stk., kann sektarrevsing verða ásett fyri brot á reglurnar í ásetingunum.

3. stk. Fyri brot, sum verða framd av partafeløgum, lutafeløgum og slíkum felagsskapum, kann sektin verða áløgd felagnum sum slíkum. Er brotið framt av einari kommunu ella á líkan hátt av kommunalum felagsskapi, sum fevndur er av løgtingslóg um føroyska kommunurnar, kann sekt verða løgd á kommunur ella kommunala felagsskapin.

Stk. 5. Landsstyret fastsætter bestemmelser for nævnets sagsbehandling.

§ *18.* Med bøde straffes den, der overtræder § 3, § 5, stk. 1 og 2, § 6, stk. 1, 3 og 4, § 7, § 8, § 10, stk. 1, § 11, stk. 1 og 3, § 12, stk. 1 og 3, og § 13, 2. og 3. punktum, eller overtræder de i medfør af loven foretagne besætningsfastsættelser.

Stk. 2. I forskrifter, der fastsættes i medfør af § 11, stk. 5, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelserne i forskrifterne.

Stk. 3. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber, eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar. Er overtrædelsen begået af en kommune eller på tilsvarende måde af et kommunalt fællesskab, der er omfattet af lagtingsloven om de færøske kommuner, kan der pålægges kommunen eller det kommunale fællesskab bødeansvar.

Kapittul 6
Gildiskoma og umskiftisásetingar

§ *19.* Lógin fær gildi 1. juli 1987.

2. stk. Samstundis fer løgtingslóg nr. 104 frá 6. november 1984 um manning av skipum §§ 1-9 úr gildi.

§ *20.* Sjóvinnubrøv útgivin, áðrenn lógin fekk gildi, gevur ánarum teirra somu rættindi, sum tey høvdu framman-anundan.

§ *21.* Skip, sum eru í sigling, tann dag lógin fær gildi, og hvørs manning ikki

Kapitel 6
Ikrafttrædelses- og overgangsbestemmelser

§ *19.* Loven træder i kraft den 1. juli 1987.

Stk. 2. Samtidig ophæves §§ 1-9 i lagtingslov nr. 104 af 6. juni 1984 om skibes bemanding.

§ *20.* Sønæringsbeviser erhvervet før lovens ikrafttræden hjemler deres indehavere samme ret som hidtil.

§ *21.* Skibe, der er i fart på det tidspunkt, hvor loven træder i kraft, og

er ásett í lógini, skulu hava manning samsvarandi teimum manningarreglum og manningaráseting um, sum higartil hava verið galdandi, til nýggj manning er ásett.

2. stk. Førir manningaráseting in, sum nevnd er í 1. stk., við sær minni krøv, skal minkingin av manningini teir fyrstu 6 mánaðirnar frá ásetingini bert fara fram við náttúrligari frágongd ella við komu í føroyska havn. Donsk ella grønlendsk havn verða bert mettar sum føroysk havn, um so er, at sjómaðurin hevur bústað í Danmark ella í Grønlandi.

hvis besætning ikke er fastsat i loven, skal have besætning i overensstemmelse med hidtil gældende bemandingsregler og bemandingsfastsættelser, indtil ny besætning er fastsat.

Stk. 2. Medfører besætningsfastsættelsen som omhandlet i stk. 1 formindsket krav, må reduktion af besætningen inden for de første 6 måneder fra fastsættelsen kun foretages ved naturlig afgang eller ved ankomst til færøsk havn. Dansk eller grønlandsk havn anses kun for færøsk havn, såfremt vedkommende søfarende har bopæl i Danmark eller i Grønland.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi lógaruppskot er gjørt av einum arbeiðsbólki, ið landsstýrið setti í januar 1986 at kanna sjóvinnulóggávuna.

Arbeiðsbólkurin hevur handað landsstýrinum uppskot til nýggja manningarlóg, sjóvinnulóg og sjómanslóg við viðmerkingum til tær einstøku lógirnar.

Viðvíkjandi vanligu viðmerkingunum hjá arbeiðsbólkinum verður vist til viðhefta skjal.

Núgaldandi føroyska manningarlógin varð sett í gildi 6. november 1984 við smáum broytingum í mun til lógina áðrenn frá 1966.

Uppskotið til hesa lógina víkir munandi frá núgaldandi og hevur partvist ta donsku núgaldandi manningarlóg sum fyrimynd, tó við tí týðandi muni, at tað verða sett nærmast somu krøv til handils- og fiskiskip. Størstu broytingarnar í mun til galdandi lóg eru:

1. Sjóvinnulógin kemur í staðinum fyri serstaka lóg.
2. Fiskiskip og handilsskip eru í somu manningartalvum.
3. Stjórin, ið umsitur manningarlógina, verður einasti myndugleiki, sum ásetir sjóvinnukrøv og manningartal á føroyskum skipum.
4. Avgerðir stjórans kunnu kærast til sjóvinnuráðið við javnbýtis limum úr reiðara- og yrkisfeløgum.

Ein løgfrøðingur er formaður.

Sjóvinnukrøv og manningartal sambært hesi manningarlóg eru grundað á tryggdina fyri fólk og farm.

Viðvíkjandi § 2:

1. Arbeiðsbólkurin metir, at manningaruísetanin og umsittingin av lógini annars mugu vera á einum politiskt óheftum stovni, og at kærumyndugleikin skal vera til sjóvinnuráðið.

2. I.M.O. stovnurin í London hevur sent limalondum eina vegleiðing, sum sigur, hvat verður lagt í orðingina »nærsigling«, á enskum »near coastal voyages«. Orðingin viðlogd.

10. og

11. Millumlandasáttmálin S.T.C.W setir krøv um siglinguttan fyri »near coastal voyages«, og hava vit størri rásarúm í heimasjógvi, tá vit nýta 200 fjórðingar sum heimasiglingarøki.

Viðvíkjandi § 4:

Stk. 2 og 3 setir teir karmar, manningin verður sett eftir.

Viðvíkjandi § 6:

Stk. 1. Talvan er ein vegleiðandi áseting hjá stjóranum at nýta.

Sambært grein 15 kann stjórin víkja frá nevndu talvu í grein 4, stk. 1.

At enda kann nevnast, at arbeiðsbólkurin hevur verið í sambandi við danskar myndugleikar og fingið við í álitið teirra royndir við núgaldandi donsku manningarlóg.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið hin 28. mars 1987. Landsstýrið leggur dent á, at neyðugt er at broyta verandi lóggávu, og ger vart við hesar 4 høvuðsbroytingar:

1. Sjóvinnulógin kemur í serstaka lóg.

2. Fiskiskip og handilsskip verða í somu manningartalvum.

3. Stjórin, ið umsitur manningarlógina, ásetir sjóvinnukrøv og manningartal.

4. Avgerðir stjórans kunnu kærast til eitt sjóvinnuráð.

Málið varð við 1. viðgerð hin 8. apríl 1987 beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Nevndin heldur málið vera so umfatandi, at hon eigur at fáa stundir at viðgera tað meira gjølla, enn møguligt er bert fáar dagar fyri tingslit.

Rættarnevndin mælir til, at uppskot til løgtingslóg um manning av skipum verður viðgjørt framhaldandi í rættarnevndini, sum leggur fram álit í málinum í ólavsøkutingsetuni. Hesum samsvarandi setir nevndin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur rættarnevndini at viðgera uppskot landsstýrisins um manning av skipum sum milluntinganevnd og at leggja málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskotið til samtyktar frá rættarnevndini samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1600-3-3

115 Sjóvinnulóg

Ár 1987, fríggjadagin 27. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot til

Løgtingslóg um sjóvinnu	**Lagtingslov om sønæring**
Kapittul 1	**Kapitel 1**
§ 1. Í hesari lóg merkir:	§ 1. I denne lov forstås ved
1) »Fiskiskip«: Eitt og hvørt skip, tá ið tjóðskaparbræv tess hevur havnarkenningarnummar.	1) »Fiskeskib«: Et skib, hvis nationalitetsbevis er forsynet med havnekendingsnummer.

2) »Handilsskip«: Eitt og hvørt skip, tá ið fiskiskip og stuttleikafør eru undantikin.
3) »Stuttleikafar«: Skip, sum ikki verða nýtt til vinnuligt endamál. Er ivamál, avger skipaeftirlitið, um eitt skip skal metast sum stuttleikafar.
4) »Tons«: Skrásett tons brutto, sum eina og hvørja tíð eru tilskilað í skipsins málibrævi ella máliprógvi, men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru. Hevur málibrævið ella máliprógvið tvey bruttoskrásetingartonsatøl, geldur størra talið.
5) »Góðkent«: Góðkent sambært løgtingslóg nr. 65 frá 6. juni 1984 um sjómannaútbugvingar við seinni broytingum.
6) »Havskip«: Skip, sum verða nýtt í sigling uttan fyri havnir ella vard øki.
7) »Vard øki«: Føroya Landsstýri ásetur, hvørji øki verða roknað sum vard.

2) »Handelsskib«: Ethvert skib med undtagelse af fiskeskibe og fritidsfartøjer.
3) »Fritidsfartøj«: Et skib, der ikke anvendes til erhvervsmæssige formål. I tvivlstilfælde afgør skibstilsynet, om et skib kan anses for et fritidsfartøj.
4) »Tons«: Registertons brutto som til enhver tid i skibets målebrev eller målingsbevis angivet, idet eventuelle decimaler bortkastes. Indeholder målebrevet eller målingsbeviset 2 bruttoregistertonnager, da den største af disse.
5) »Godkendt«: Godkendt i henhold til lagtingslov nr. 65 af 6. juni 1984 om søfartsuddannelse med senere ændringer.
6) »Søgående skib«: Et skib, der anvendes i fart uden for havne eller beskyttede farvand.
7) »Beskyttet farvand«: Færøernes Landsstyre fastsætter, hvilke farvande skal betragtes som beskyttede.

Kapittul 2

§ 2. Til at fáa dugnaskaparbræv í sigling krevst, at avvarðandi

1) hevur havt siglingartíð, sum Føroya Landsstýri ásetur, við havskipum,
2) hevur staðið dugnaskaparroynd, sum Føroya Landsstýri ásetur, í sigling,
3) hevur staðið sjón- og hoyrnarroynd, sum Føroya Landsstýri ásetur,
4) hevur fingið VHF-prógv og
5) er myndugur.

Kapitel 2

§ 2. Til erhvervelse af dueligheds bevis i sejlads kræves, at vedkommende

1) har erhvervet en af Færøernes Landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,
2) har bestået en af Færøernes Landsstyre fastsat dueligheds prøve i sejlads, og
3) har bestået en af Færøernes Landsstyre fastsat syns- og høreprøve,
4) har erhvervet VHF-certifikat, og
5) er myndig.

§ 3. Til at fáa vinnubræv sum stýrimaður á 4. stigi krevst, at avvarðandi
1) hevur havt siglingartíð við havskipum, sum Føroya Landsstýri ásetur,
2) hevur staðið heimaskipararoynd,
3) er myndugur,
4) hevur staðið sjón- og hoyrnarroynd, sum Føroya Landsstýri ásetur, og
5) hevur fingið alment prógv sum radiotelefonistur.

§ 4. Til at fáa vinnubræv sum heima skipari krevst, at avvarðandi
1) lýkur tær treytir, sum § 3 setur,
2) hevur havt tænastu
   a) í 12 mánaðir, har vinnubræv sum stýrimaður á 4. stigi krevst, ella
   b) samsvarandi starv við útlendskum skipum,
3) hevur heimarætt og
4) hevur fylt 20 ár.

§ 5. Til at fáa vinnubræv sum stýrimaður á 3. stigi krevst, at avvarðandi
1) hevur havt siglingartíð, sum Føroya Landsstýri ásetur við havskipum,
2) hevur staðið skipararoynd,
3) er myndugur,
4) hevur staðið sjón- og hoyrnarroynd, sum Føroya Landsstýri ásetur, og
5) hevur fingið alment prógv sum radiotelefonistur.

§ 6. Til at fáa vinnubræv sum skipari krevst, at avvarðandi
1) lýkur tær treytir, sum § 5 setur,

§ 3. Til erhvervelse af bevis som styrmand af 4. grad kræves, at vedkommende
1) har erhvervet en af Færøernes Landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,
2) har bestået kystskippereksamen,
3) er myndig,
4) har bestået en af Færøernes Landsstyre fastsat syns- og høreprøve og
5) har erhvervet generelt certifikat som radiotelefonist.

§ 4. Til erhvervelse af bevis som kystskipper kræves, at vedkommende
1) opfylder de i § 3 fastsatte betingelser,
2) har gjort tjeneste
   a) i 12 måneder under forhold, hvor bevis som styrmand af 4. grad kræves, eller
   b) i tilsvarende stilling i udenlandske skibe,
3) har indfødsret og
4) er fyldt 20 år.

§ 5. Til erhvervelse af bevis som styrmand af 3. grad kræves, at vedkommende
1) har erhvervet en af Færøernes Landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,
2) har bestået skippereksamen,
3) er myndig,
4) har bestået en af Færøernes Landsstyre fastsat syns- og høreprøve og
5) har erhvervet generelt certifikat som radiotelefonist.

§ 6. Til erhvervelse af bevis som skipper kræves, at vedkommende
1) opfylder de i § 5 fastsatte betingelser,

2) hevur havt tænastu
   a) í 24 mánaðir har vinnubræv sum stýrimaður á 3. stigi krevst, av hesum 12 mánaðir sum hægsti ella einasti stýrimaður, ella
   b) samsvarandi starv við útlendskum skipum og
3) hevur heimarætt.

§ 7. Til at fáa vinnubræv sum stýrimaður á 2. stigi krevst, at avvarðandi
1) hevur havt siglingartíð við havskipum, so sum Føroya Landsstýri ásetur,
2) hevur staðið skipsførararoynd,
3) er myndugur,
4) hevur staðið sjón- og hoyrnarroynd, sum Føroya Landsstýri ásetur, og
5) hevur fingið alment prógv sum radiotelefonistur.

§ 8. Til at fáa vinnubræv sum stýrimaður á 1. stigi krevst, at avvarðandi
1) lýkur tær treytir, sum § 7 setur, og
2) hevur havt siglingartíð sum stýrimaður við havskipum, so sum Føroya Landsstýri ásetur.

§ 9. Til at fáa vinnubræv sum skipsførari krevst, at avvarðandi
1) lýkur tær treytir, sum § 7 setur,
2) hevur havt tænastu
   a) í 24 mánaðir, har vinnubræv sum stýrimaður á 2. stigi krevst, av hesum 12 mánaðir sum hægsti ella einasti stýrimaður, ella

2) har gjort tjeneste
   a) i 24 måneder under forhold, hvor bevis som styrmand af 3. grad kræves, heraf 12 måneder som øverste eller eneste styrmand, eller
   b) i tilsvarende stillinger i udenlandske skibe og
3) har indfødsret.

§ 7. Til erhvervelse af bevis som styrmand af 2. grad kræves, at vedkommende
1) har erhvervet en af Færøernes Landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,
2) har bestået skibsførereksamen,
3) er myndig,
4) har bestået en af Færøernes Landsstyre fastsat syns- og høreprøve og
5) har erhvervet generelt certifikat som radiotelefonist.

§ 8. Til erhvervelse af bevis som styrmand af 1. grad kræves, at vedkommende
1) opfylder de i § 7 fastsatte betingelser og
2) har erhvervet en af Færøernes Landsstyre fastsat fartstid som styrmand i søgående skibe.

§ 9. Til erhvervelse af bevis som skibsfører kræves, at vedkommende
1) opfylder de i § 7 fastsatte betingelser,
2) har gjort tjeneste
   a) i 24 måneder under forhold, hvor bevis som styrmand af 2. grad kræves, heraf 12 måneder som øverste eller eneste styrmand, eller

b) í 60 mánaðir har vinnubræv sum stýrimaður á 2. stigi krevst, av hesum 36 mánaðir sum næsthægsti stýrimaður í skipum yvir 1600 tons, ella
c) samsvarandi starv við útlendskum skipum og
3) hevur heimarætt.

§ *10.* Til at fáa dugnaskaparbræv í motorpassing krevst, at avvarðandi
1) hevur verið í sigling 6 mánaðir og
2) hevur staðið dugnaskaparroynd í motorpassing, sum Føroya Landsstýri ásetur.

§ *11.* Til at fáa vinnubræv sum motorpassari krevst, at avvarðandi
1) hevur havt maskintænastu við damp- ella motorhavskipum í 12 mánaðir,
2) hevur staðið motorpassararoynd og
3) er myndugur.

§ *12.* Til at fáa vinnubræv sum skipsmaskinistur krevst, at avvarðandi
1) hevur havt maskintænastu við damp- ella motorhavskipum í 12 mánaðir,
2) hevur staðið maskinistroynd og
3) er myndugur.

§ *13.* Til at fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 3. stigi krevst, at avvarðandi
1) hevur havt maskintænastu við damp- ella motorhavskipum í 12 mánaðir,
2) hevur staðið maskinmeistararoynd og
3) er myndugur.

b) i 60 måneder under forhold, hvor bevis som styrmand af 2. grad kræves, heraf 36 måneder som næstøverste styrmand i skibe over 1600 tons, eller
c) i tilsvarende stilling i udenlandske skibe og
3) har indfødsret.

§ *10.* Til erhvervelse af dueligheds bevis i motorpasning kræves, at vedkommende
1) har faret til søs i 6 måneder og
2) har bestået en af Færøernes Landsstyre fastsat dueligheds prøve i motorpasning.

§ *11.* Til erhvervelse af bevis som motorpasser kræves, at vedkommende
1) har gjort maskintjeneste i søgående damp- eller motorskibe i 12 måneder,
2) har bestået motorpassereksamen og
3) er myndig.

§ *12.* Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinist kræves, at vedkommende
1) har gjort maskintjeneste i søgående damp- eller motorskibe i 12 måneder,
2) har bestået maskinisteksamen og
3) er myndig.

§ *13.* Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinmester af 3. grad kræves, at vedkommende
1) har gjort maskintjeneste i søgående damp eller motorskibe i 12 måneder,
2) har bestået maskinmestereksamen og
3) er myndig.

§ *14.* Til at fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 2. stigi krevst, at avvarðandi

1) hevur havt maskintænastu við damp- ella motorhavskipum í 24 mánaðir og
2) lýkur tær treytir, sum § 13 nr. 2 og 3 setur.

§ *15.* Til at fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 1. stigi krevst, at avvarðandi

1) lýkur tær treytir, sum § 14 setur, og síðan
2) hevur havt tænastu
   a) í 12 mánaðir, har vinnubræv sum maskinmeistari á 2. stigi krevst, ella
   b) samsvarandi starv við útlendskum skipum.

§ *16.* Til at fáa vinnubræv sum skipsmaskinstjóri krevst, at avvarðandi

1) lýkur tær treytir, sum § 15 setur og síðani
2) hevur havt tænastu
   a) í 12 mánaðir, har vinnubræv sum maskinmeistari á 1. stigi krevst, ella
   b) samsvarandi starv við útlendskum skipum og
3) hevur staðið víðkaða maskinmeistararoynd.

§ *17.* Sjóvinnubrøv útgivin samsvarandi §§ 11-16 geva rætt til at inna tænastu bæði á dampskipum og motorskipum, um so er, at ein hevur havt maskintænastu í 3 mánaðir á dampskipum og 3 mánaðir á motorskipum. Hevur onkur ikki 3 mánaða tænastu á dampskipi ella motorskipi, fær vinnu-

§ *14.* Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinmester af 2. grad kræves, at vedkommende

1) har gjort maskintjeneste i søgående damp- eller motorskibe i 24 måneder og
2) opfylder de i § 13 nr. 2 og 3 fastsatte betingelser

§ *15.* Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinmester af 1. grad kræves, at vedkommende

1) opfylder de i § 14 fastsatte betingelser og derefter
2) har gjort tjeneste
   a) i 12 måneder under forhold, hvor bevis som skibsmaskinmester af 2. grad kræves, eller
   b) i tilsvarende stilling i udenlandske skibe.

§ *16.* Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinchef kræves, at vedkommende

1) opfylder de i § 15 fastsatte betingelser og derefter
2) har gjort tjeneste
   a) i 12 måneder under forhold, hvor bevis som skibsmaskinmester af 1. grad kræves, eller
   b) i tilsvarende stilling i udenlandske skibe og
3) har bestået udvidet maskinmestereksamen.

§ *17.* De i §§ 11-16 omhandlede søfaringsbeviser giver ret til at gøre tjeneste såvel i dampskibe som i motorskibe, såfremt den pågældende har gjort maskintjeneste i 3 måneder i dampskibe og 3 måneder i motorskibe. Har den pågældende ikke 3 måneders tjeneste i enten dampskibe eller motorskibe,

brævið ella árit um, at tað bara verður at nýta til tænastu á ávikavist motorskipi ella dampskipi.

§ *18.* Til at fáa vinnubræv sum skipsfjarritari ella skipsradiotelefonistur krevst, at avvarðandi

1) hevur alment prógv sum fjarritari, ávikavist alment prógv sum radiotelefonistur, útgivið sambært ásetingunum í altjóða radioreglugerðini og
2) hevur tikið lut í eini trygdarútbúgving, sum Føroya Landsstýri ásetur.

§ *19.* Til at fáa vinnubræv sum skipskokkur krevst, at avvarðandi

1) hevur verið á
   a) grundskeiði, sum Føroya Landsstýri hevur góðkent, og síðan havt lærutíð í kokkayrkinum til longdar í minsta lagi 12 mánaðir við havskipum ella
   b) hevur lærutíð í kokkayrkinum til longdar minst 33 mánaðir, av hesum í minsta lagi 18 mánaðir við havskipum, og hevur verið á góðkendum skeiði í eldsløkking og í nýtslu av bjargingarútgerð v.m. og
2) hevur staðið skipskokkaroynd.

2. stk. Vinnubræv sum skipskokkur verður eisini givið persóni, sum hevur staðið sveinaroyndina í kokkayrkinum ella aðrari samsvarandi útbúgving, og sum hevur havt kokkahústænastu á havskipum í minsta lagi 12 mánaðir.

gives der beviset påtegning om, at det alene kan anvendes til tjeneste i henholdsvis motorskibe eller dampskibe.

§ *18.* Til erhvervelse af bevis som skibsradiotelegrafist eller skibsradiotelefonist kræves, at vedkommende

1) er i besiddelse af generelt certifikat som radiotelegrafist henholdsvis generelt certifikat som radiotelefonist udstedt i henhold til bestemmelserne i det internationale radioreglement og
2) har gennemgået en af Færøernes Landsstyre fastsat sikkerhedsuddannelse.

§ *19.* Til erhvervelse af bevis som skibskok kræves, at vedkommende

1) har gennemgået
   a) et af Færøernes Landsstyre godkendt grundkursus og derefter en læretid i kokkefaget på mindst 23 måneder, heraf mindst 12 måneder i søgående skibe, eller
   b) en læretid i kokkefaget på mindst 33 måneder, heraf mindst 18 måneder i søgående skibe, og som har gennemgået et godkendt kursus i brandslukning og i brug af redningsmidler m.v. og
2) har bestået skibskokkeeksamen.

2. stk. Bevis som skibskok kan endvidere udstedes til person, der har bestået kokkefagets svendeprøve eller anden tilsvarende uddannelse inden for kokkefaget, og som har gjort kabystjeneste i søgående skibe i mindst 12 måneder.

§ *20.* Til at mynstra sum ófulltikin matrósur ella dekkari, ófulltikin motormaður og ófulltikin skipsatstøðari skal avvarðandi, tá ið starvssetanin er farin fram her á landi, lúka eina av niðanfyri standandi treytum:

1) hava tikið lut í góðkendum grundskeiði á sjóvinnuskúla ella
2) hava tikið lut í sjóferð við skúlaskipi, sum góðkent er til tess.

2. stk. Fer ikki mynstringin ella starvsetanin fram her á landi, skal avvarðandi lúka treytirnar í 1. stk. ella hava havt ávikavist dekstænastu, maskintænastu ella doks- og maskintænastu sum limur av eini eindarmanning á havskipum í 12 mánaðir.

3. stk. Uttan mun til ásetingarnar í 1. stk. kann tann, sum hevur fingið sveinabræv ella útbúgvingarprógv sum maskinsmiður, skipsmontørur, kleinsmiður, landbúnaðarmaskinsmiður, bilsmiður, traktorsmiður, lastbilsmiður, bilelektromekanikari, elektromekanikari, entreprenørmaskinsmiður, rørsmiður, blikksmiður og elektrikari og sum hevur verið á góðkendum skeiði í eldsløkking og í nýtslu av bjargingarútgerð v.m., mynstra sum ófulltikin motormaður ella maskinatstøðari.

§ *20.* For at kunne påmønstres som ubefaren matros, ubefaren motormand eller ubefaren skibsassistent skal vedkommende, når ansættelse er sket her i landet, opfylde en af nedenstående betingelser:

1) have gennemgået et godkendt grundkursus på søfartsskole eller
2) have gennemført et togt med et dertil godkendt skoleskib.

2. stk. Findes hverken påmønstringen eller ansættelsen sted her i landet, skal vedkommende enten opfylde betingelserne i 1. stk. eller have udført henholdsvis dækstjeneste, maskintjeneste eller dæks- og maskintjeneste som medlem af en enhedsbesætning i søgående skibe i 12 måneder.

3. stk. Uanset bestemmelserne i stk. 1 kan en person, der har erhvervet svendebrev eller uddannelsesbevis som maskinarbejder, skibsmontør, klejnsmed, landbrugsmaskinmekaniker, personvognsmekaniker, traktormekaniker, lastvognsmekaniker, autoelektromekaniker, elektromekaniker, entreprenørmaskinemekaniker, rørsmed, blikkenslager og elektriker, og som har gennemgået et godkendt kursus i brandslukning og i brug af redningsmidler m.v., påmønstres som ubefaren motormand eller maskinassistent.

§ *21.* Til at mynstra sum fulltikin matrósur ella dekkari skal avvarðandi, tá starvsetan er farin fram her á landi, hava lokið treytirnar í § 20, 1. stk. og síðan hava havt dekstænastu á havskipum í 18 mánaðir.

§ *21.* For at kunne påmønstres som befaren matros skal vedkommende, når ansættelse er sket her i landet, efter at have opfyldt betingelserne i § 20, stk. 1, have udført dækstjeneste i søgående skibe i 18 måneder.

2. stk. Fer hvørki mynstring ella starvsetan fram her á landi, skal avvarðandi lúka treytirnar í 1. stk. ella hava havt dekstænastu á havskipum í 36 mánaðir.
3. stk. Siglingartíð út um 5 mánaðir við skúlaskipi fæst íroknað siglingartíðina eftir 1. stk.

2. stk. Finder hverken påmønstring eller ansættelsen sted her i landet, skal vedkommende enten opfylde betingelserne i 1. stk. eller have udført dækstjeneste i søgående skibe i 36 måneder.
3. stk. Fartstid ud over 5 måneder med et godkendt skoleskib kan medregnes i fartstiden efter 1. stk.

§ *22.* Til at mynstra sum fulltíkin motormaður skal avvarðandi, tá starvsetan er farin fram her á landi, hava lokið treytirnar í § 20, 1. ella 3. stk. og síðan hava havt maskintænastu á havskipum í 12 mánaðir.
2. stk. Siglingartíð út um 5 mánaðir við góðkendum skúlaskipi fæst uppíroknað siglingartíðina eftir 1. stk.
3. stk. Fer ikki mynstring ella starvsetan fram her á landi, skal avvarðandi lúka treytirnar í 1. stk. ella hava havt maskintænastu á havskipum í 24 mánaðir.

§ *22.* For at kunne påmønstres som befaren motormand skal vedkommende, når ansættelsen er sket her i landet efter at have opfyldt betingelserne i § 20, stk. 1 eller 3, have udført maskintjeneste i søgående skibe i 12 måneder.
2. stk. Fartstid ud over 5 måneder med et godkendt skoleskib kan medregnes i fartstiden efter 1. stk.
3. stk. Finder hverken påmønstringen eller ansættelsen sted her i landet, skal vedkommende enten opfylde betingelserne i 1. stk. eller have udført maskintjeneste i søgående skibe i 24 måneder.

§ *23.* Til at mynstra sum fulltíkin skipsatstøðari skal avvarðandi, tá ið starvsetan er farin fram her á landi, hava lokið treytirnar í § 20, 1. stk. og síðan hava havt tænastu sum ófull tíkin skipsatstøðari við havskipum í 18 mánaðir og haraftrat hava verið á góðkendum yrkisskeiði fyri skipsatstøðarar.
2. stk. Fer hvørki mynstringin ella starvsetanin fram her á landi, skal avvarðandi lúka treytirnar í 1. stk. ella hava havt deks- og maskintænastu sum limur av eindarmanning á havskipum í 36 mánaðir.

§ *23.* For at kunne påmønstres som befaren skibsassistent skal vedkommende, når ansættelse er sket her i landet, efter at have opfyldt betingelserne i § 20, stk. 1 have udført tjeneste som ubefaren skibsassistent i søgående skibe i 18 måneder samt have gennemgået et erhvervsfagligt afslutningskursus for skibsassistenter.
2. stk. Finder hverken påmønstringen eller ansættelsen sted her i landet, skal vedkommende enten opfylde betingelserne i 1. stk. eller have udført dæks- og maskintjeneste som medlem af en enhedsbesætning i søgående skibe i 36 måneder.

3. stk. Siglingartíð út um 5 mánaðir við góðkendum skúlaskipi fæst upproknað siglingartíðina eftir 1. stk.

3. stk. Fartstid ud over 5 maneder med godkendt skoleskib kan medregnes i fartstiden efter 1. stk.

Kapitul 3

§ *24.* Sjóvinnubrøv, heruppií dugnaskaparbrøv, verða útgivin ókeypis og í tí skapi, sum Føroya Landsstýri fyriskipar.

2. stk. Sjóvinnubrøv eftir §§ 2-16 og brøv sum skipsfjarritari eftir § 18 missa gildi, um ánarin ikki fyri hvørt farið 5 ára skeið kann prógva at hava havt 12 mánaða tænastu í starvi, har slíkt vinnubræv krevst, ella hevur havt annað starv, sum er at javnmeta við hetta og Føroya Landsstýri góðkennir sum slíkt. Føroya Landsstýri ásetur reglur um, hvussu sjóvinnurættindi fáast aftur.

Kapitel 3

§ *24.* Sønæringsbeviser, herunder dueligheds beviser, udstedes uden betaling og udformes efter forskrifter fastsat af Færøernes Landsstyre.

2. stk. Sønæringsbeviser efter §§ 2-16, og bevis som skibsradiotelegrafist efter § 18 mister deres gyldighed, såfremt indehaveren ikke for enhver forudgående 5 års periode kan dokumentere at have udført 12 måneders tjeneste i stilling, hvor sadant bevis kræves, eller har haft anden af Færøernes Landsstyre godkendt beskæftigelse, som kan sidestilles hermed. Færøernes Landsstyre fastsætter regler om generhvervelse af sønæringsrettigheder.

§ *25.* Føroya Landsstýri ásetur reglur um ávís útbúgvingarkrøv fyri yvirmenn og manning á olju-, kemikalii- og gasstangaskipum. Føroya Landsstýri kann eisini áseta reglur um ávís útbúgvingarkrøv fyri yvirmenn á skipum við serligum stýrieginleikum ella skipum við serligari útgerð.

§ 25. Færøernes Landsstyre fastsætter regler om særlige uddannelseskrav for officerer og mandskab i olie-, kemikalie og gastankskibe. Færøernes Landstyre kan endvidere fastsætte regler om særlige uddannelseskrav for officerer i skibe med særlige manøvreegenskaber eller skibe med særlig udrustning.

§ *26.* Tann, sum hevur vinnubræv sum stýrimaður á 1. ella 2. stigi, verður eisini mettur at hava vinnubræv sum stýrimaður á 3. stigi. Tann, ið, áðrenn henda lóg fær gildi, hevur fingið bræv sum stýrimaður á 1. ella 2. stigi, verður eisini mettur at hava vinnubræv sum skipari, um so er, at avvarðandi hevur heimarætt.

§ *26.* Den, der har bevis som styrmand af 1. eller 2. grad, anses tillige for at have bevis som styrmand af 3. grad. Den, der for lovens ikrafttræden har erhvervet bevis som styrmand af 1. eller 2. grad, anses tillige for at have bevis som skipper, såfremt vedkommende har indfødsret.

§ 27. Føroya Landsstýri kann, tá tilmæli frammanundan er fingið frá sjóvinnuráðnum, tá ið serliga ber til, geva loyvi til, at sjóvinnubrøv, møguliga við avmarkaðum rættindum, verða útgivin, hóast tey krøv, sum ásett eru til at fáa nevndu vinnubrøv, ikki eru lokin til fulnar. Undantøk viðvíkjandi prógtøku- og siglingarkrøvum kunnu tó bara verða gjørd, um avvarðandi á annan hátt prógvar at hava fingið neyðuga ástøðiliga og verkligа útbúgving.

2. stk. Føroya Landsstýri kann, tá ið serliga ber til, loyva persóni at hava støðuga tænastu í starvi, sum ikki krevur sjóvinnubræv, hóast at avvarðandi ikki lýkur tey krøv til fulnar, sum eru sett við mynstring í starvinum. Slíkt loyvi kann tó ikki verða givið, uttan avvarðandi prógvar at hava fingið ta roynd og útbúgving, sum er neyðug til tænastu í starvinum, og skal tilmæli vera fingið frammanundan frá sjóvinnuráðnum.

3. stk. Føroya Landsstýri kann javnseta sjóvinnuútbúgving í útlondum við tey grundskeið og yrkisskeið, sum nevnd eru í hesi lóg.

4. stk. Uttan mun til reglurnar í § 20, 1. stk., § 21, 1. stk., § 22, 1. stk., og § 23, 1. stk., kann skipari, tá tað verður hildið neyðugt til tess at sleppa undan, at skip verður tarnað, í undantaksføri mynstra persón sum ófulltiknan matrós ella dekkara, fulltiknan matrós ella dekkara, ófulltiknan motormann, fulltiknan motormann, ófulltiknan skipsatstøðara ella fulltiknan skipsatstøðara, sjálvt um viðkomandi ikki lýkur tær treytir, sum ásettar eru í nevndu reglum fyri mynstring. Slík

§ 27. Færøernes Landsstyre kan efter forud indhentet indstilling fra søfartsrådet under særlige omstændigheder tillade udstedelse af sønæringsbevis, eventuelt med begrænsede rettigheder, uanset at de krav, der er fastsat for erhvervelse af det pågældende bevis, ikke fuldt ud er opfyldt. Fritagelse for opfyldelse af eksamens- og fartskrav kan dog kun gives, for så vidt den pågældende dokumenterer på anden måde at have erhvervet sig tilstrækkelig teoretisk og praktisk uddannelse.

2. stk. Færøernes Landsstyre kan under særlige omstændigheder tillade en person vedvarende at gøre tjeneste i stilling, hvortil der ikke kræves sønæringsbevis, uanset at den pågældende ikke fuldt ud opfylder de krav, der er fastsat for mønstring i stillingen. Sådan tilladelse kan dog kun gives, for så vidt den pågældende dokumenterer at have erhvervet den erfaring og uddannelse, der er nødvendig for tjeneste i stillingen, samt efter forud indhentet indstilling fra søfartsrådet.

3. stk. Færøernes Landsstyre kan ligestille en i udlandet gennemgået søfartsuddannelse med de i denne lov omhandlede grundkursus og afslutningskursus.

4. stk. Uanset bestemmelserne i § 20, 1. stk., § 21, 1. stk., § 22, 1. stk., og § 23, 1. stk., kan en skibsfører, når det skønnes nødvendigt for at undgå ophold af et skib, undtagelsesvis påmønstre en person som ubefaren matros, befaren matros, ubefaren motormand, befaren motormand, ubefaren skibsassistent eller befaren skibsassistent, selv om den pågældende ikke opfylder de be-

mynstring kann bara fara fram fyri túrin og, tá ið starvssetanin ikki er farin fram her á landi, bert við teirri fyritreyt, at avvarðandi lýkur tey krøv um siglingartíð, sum eru ásett við mynstring i samsvarandi starvi.

tingelser, der er fastsat i disse bestemmelser for påmønstringen. Sådan påmønstring må kun ske for rejsen og kun under forudsætning af, at den pågældende opfylder de fartskrav, der er fastsat for påmønstring i tilsvarende stilling, når ansættelsen ikke er sket her i landet.

§ 28. Føroya Landsstýri kann taka aftur sjóvinnubræv, um so er, at tað vegna sálarligu ella likamligu støðuna hjá persóni, sum brævið hevur, verður mett óráð at lata avvarðandi virka framhaldandi í tí starvi, sum sjóvinnubrævið gevur rætt til.

2. stk. Tann, ið hevur fingið sjóvinnubræv, skal geva seg undir slíkar læknakanningar, sum eru neyðugar, tá ið avgerð skal verða tikin um teir spurningar, sum nevndir eru í 1. stk. Útreiðslurnar í sambandi við slíkar kanningar rindar landskassin. Sleppur tann persónur, sum vinnubrævið hevur, sær undan áløgdum kanningum, kann sjóvinnubrævið verða afturtikið.

§ 28. Færøernes Landsstyre kan inddrage et sønæringsbevis, hvis det på grund af indehaverens sjælelige eller legemlige tilstand skønnes uforsvarligt fortsat at lade den pågældende udøve den virksomhed, beviset giver ret til.

2. stk. Indehaveren af et sønæringsbevis skal lade sig underkaste sådanne lægeundersøgelser, som er nødvendige til afgørelse af det i 1. stk. nævnte spørgsmål. Udgifterne ved undersøgelserne afholdes af landsstyret. Undlader indehaveren at lade sig underkaste en påbudt undersøgelse, kan sønæringsbeviset inddrages.

§ 29. Tann persónur, sum avgerðin viðvíkur, kann krevja, at afturtøka sjóvinnubrævsins verður løgd fyri dómstólarnar. Áheitan um hetta skal verða sett fram fyri Føroya Landsstýri, áðrenn 4 vikur eru gingnar, eftir at avgerðin er fráboðað avvarðandi.

2. stk. Í avgerð Føroya Landsstýris skal vera skilað til um rættin til at krevja dómsstólsroynd og freistirnar í hesum sambandi.

3. stk. Tá ið afturtøka av sjóvinnubrævi verður kravd løgd fyri dómstólarnar,

§ 29. Inddragelsen af et sønæringsbevis kan af den, afgørelsen vedrører, forlanges indbragt for domstolene. Anmodning herom skal fremsættes over for Færøernes Landsstyre inden 4 uger efter, at afgørelsen er meddelt den pågældende.

2. stk. Færøernes Landsstyres afgørelse skal indeholde oplysning om retten til at begære domstolsprøvelse og om fristen herfor.

3. stk. Når inddragelse af et sønæringsbevis forlanges indbragt for domstole

byrjar Føroya Landsstýri rættarmál ímóti avvarðandi samsvarandi reglunum um borgarliga rættargongu. Málið er sjórættarmál.

4. stk. Áheitan um at leggja málið fyri rættin førir við sær, at afturtøkan av sjóvinnubrævinum steðgar. Føroya Landsstýri kann tó ásetta, at áheitan um at leggja málið fyri rættin ikki ger steðg í afturtøkuni. Hendan avgerð landsstýrisins kann tó verða sett úr gildi við rættarúrskurði, og tað áðrenn avgerð verður tikin um, hvørt tøkan var lóglig.

ne, anlægger Færøernes Landsstyre sag imod den pågældende i den borgerlige retsplejes former. Sagen hører under søretten.

4. stk. Anmodning om indbringelse for domstolene har opsættende virkning. Færøernes Landsstyre kan dog bestemme, at en anmodning ikke har opsættende virkning. Denne afgørelse kan ved kendelse ophæves af retten inden afgørelse af spørgsmålet om inddragelsens lovlighed.

§ 30. Sjóvinnubrævið, sum er afturtikið, verður latið Føroya Landsstýri.

2. stk. Føroya Landsstýri kann eina og hvørja tíð geva tikið sjóvinnubrævið aftur, tá umstøðurnar, sum vóru orsøk til afturtøkuna, ikki longu eru hildnar at vera. Verður umsókn um at fáa brævið aftur noktað, kann umsøkjarin krevja spurningin lagdan fyri rættin. Um málið áður hevur verið lagt fyri rættin, kann hetta tó ikki verða fyrr enn í minsta lagi 1 ár eftir, at afturtøkan seinast var staðfest við dómi. § 29, 2. og 3. stk., verða nýtt tilsvarandi.

§ 30. Et sønæringsbevis, der er inddraget, skal afleveres til Færøernes Landsstyre.

2. stk. Færøernes Landsstyre kan til enhver tid tilbagegive et inddraget sønæringsbevis, når de omstændigheder, der har begrundet inddragelsen, ikke længere findes at være til stede. Afslås en ansøgning om tilbagegivelse, kan ansøgeren forlange spørgsmålet indbragt for domstolene. Såfremt sagen tidligere har været indbragt for domstolene, kan indbringelse dog kun ske mindst et år efter, at inddragelsen senest er stadfæstet ved dom. § 29, 2. og 3. stk. finder tilsvarende anvendelse.

§ 31. Tann rættur til at føra skip, sum fylgir við vinnubrøvunum sum heimaskipari, skipari ella skipsførari, fellur burtur, tá ið tann, sum hevur brævið, missir heimarætt sín. Føroya Landsstýri kann tó, tá ið serliga ber til, veita undantøk frá hesari reglu. Fær avvarðandi aftur heimarætt, skal rætturin at føra skip somuleiðis verða roknaður sum afturfingin.

§ 31. Den til beviserne som kystskipper, skipper og skibsfører knyttede ret til at være fører af skib fortabes, når indehaveren mister indfødsret. Færøernes Landsstyre kan dog under særlige omstændigheder gøre undtagelse fra denne bestemmelse. Opnår den pågældende på ny indfødsret, skal retten til at føre skib dermed anses for generhvervet.

§ *32.* Føroya Landsstýri kann eftir tilmæli frá sjóvinnufeløgunum broyta tey tonsamark, sum sett eru í skrásetingartonsum brutto til mark áseti í aðrari málieind. Men skal tá verða ansað eftir, at slík nýggj mark, so væl sum til ber, svara til tær skipastøddir, sum tonsamarkini í lógini greina.

§ *33.* Føroya Landsstýri kann heimila sjóvinnufyrisitingini ella øðrum samsvarandi stovni undir Føroya Landsstýri at fremja tær heimildir, sum í hesari lóg eru latnar Føroya Landsstýri.

2. stk. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um rættin at kæra avgerðir, sum tiknar eru, sambært heimildunum eftir 1. stk., so at avgerðirnar ikki skulu vera kærandi til landsstýrisins.

§ *32.* Færøernes Landsstyre kan efter samråd med sølivtens organisationer ændre indeholdte tonnagegrænser anført i registertons brutto til grænse fastsat ved anden måleenhed. Det skal dog herved tilstræbes, at sådanne nye grænser så vidt muligt svarer til de skibsstørrelser, som de i loven anførte tonnagegrænser er udtryk for.

§ *33.* Færøernes Landsstyre kan bemyndige søfartsadministrationen eller anden tilsvarende institution under Færøernes Landsstyre til at udøve de beføjelser, der i denne lov er tillagt Færøernes Landsstyre.

2. stk. Færøernes Landsstyre kan fastsætte regler om adgang til at påklage afgørelser, der er truffet i henhold til bemyndigelser efter 1. stk., herunder at afgørelserne ikke skal kunne indbringes for Færøernes Landsstyre.

Kapitul 4

§ *34.* Lógin kemur í gildi tann 1. juli 1987. Reglurnar í §§ 21 og 22 fáa tó ikki gildi fyrr enn 1 ár eftir, at lógin annars er komin í gildi.

2. stk. Løgtingslóg nr. 104 frá 6. november 1984 §§ 10-36 fer samstundis úr gildi.

Kapitel 4

§ *34.* Loven træder i kraft den 1. juli 1987. Bestemmelserne i §§ 21 og 22 træder dog først i kraft 1 år efter lovens ikrafttræden.

2. stk. Lagtingslov nr. 104 frá 6. november 1984 §§ 10-36 ophæves.

§ *35.* Tey vinnubrøv, sum við heimild í løgtingslóg nr. 104 frá 6. november 1984 eru givin, og somuleiðis vinnubrøv, sum við heimild í fyribils reglunum í nevndu lóg verða javnsett við nevndu vinnubrøv, heimila tí persóni, sum hevur fingið tey, somu rættindi sum higartil. Teimum verða harumframt givin tey rættindi, sum sam

§ *35.* De i medfør af lagtingslov nr. 104 af 6. november 1984 om skibets bemanding, udfærdigede sømandsbeviser samt beviser, der i medfør af overgangsbestemmelserne i nævnte lov ligestilles hermed, hjemler deres indehavere samme ret som hidtil. De tillægges endvidere de yderligere rettigheder, som ifølge lov om skibes be

bært lóg um manning av skipum verður givin slíkum vinnubrøvum ella givin teimum vinnubrøvum, sum í hesari lóg hava sama navn, við tað at niðanfyri nevndu vinnubrøv verða mett at svara til vinnubrøvini eftir hesari lóg soleiðis:

1) Vinnubræv sum bestimaður við heimaskipararoynd staðin seinni enn 1. juli 1982 svarar til vinnubræv sum stýrimaður á 4. stigi.
2) Vinnubræv sum bestimaður við skipararoynd staðin seinni enn 1. juli 1982 svarar til vinnubræv sum stýrimaður á 3. stigi.
3) Vinnubræv sum skipari við skipararoynd staðin seinni enn 1. juli 1982 svarar til vinnubræv sum skipari.
4) Vinnubræv sum skipsførari á 1. stigi svarar til vinnubræv sum skipsførari.

2. stk. Reglurnar í § 24, 2. stk., og § 31 verða samsvarandi nýttar um vinnubrøvini eftir stk. 1.

3. stk. Prógv sum radiofjarritari og radiotelefonistur útgivin eftir reglunum í altjóða radioreglugerðini, áðrenn henda lóg kom í gildi, gevur framhaldandi rætt til at hava radiotænastu í starvi, har prógv sum skipsradiofjarritari ávikavist skipsradiotelefonistur verður kravt.

4. stk. Føroya Landsstýri kann geva loyvi til at geva út sjóvinnubrøv eftir reglunum í teirri lóggávu, sum fer úr gildi sambært § 34, 2. stk., til persónar, sum hava staðið stýrimansroynd, og til persónar, sum eftir fyribilsreglunum í lóg um sjómansútbúgving fáa nevnda prógv, eftir at henda lógin er komin í gildi. Tó er tað treyt, at avvarðandi

sætning tillægges sådanne beviser eller tillægges de i denne lov omhandlede beviser af samme navn, idet nedennævnte beviser anses at svare til de i denne lov omhandlede beviser som følger:

1) Bevis som kystskipper med kystskippereksamen bestået senere end 1. juli 1982 svarer til bevis som styrmand af 4. grad.
2) Bevis som bedstemand med skippereksamen bestået senere end 1. juli 1982 svarer til bevis som styrmand af 3. grad.
3) Bevis som skipper med skippereksamen bestået senere end 1. juli 1982 svarer til bevis som skipper.
4) Bevis som skibsfører af 1. grad svarer til bevis som skibsfører.

2. stk. Bestemmelserne i § 24, stk. 2, og § 31 finder tilsvarende anvendelse på de i stk. 1 omhandlede beviser.

3. stk. Certifikater som radiotelegrafist og radiotelefonist udstedt i henhold til bestemmelserne i det internationale radioreglement før denne lovs ikrafttræden giver fortsat ret til at udføre radiotjeneste i stilling, hvor bevis som skibsradiotelegrafist henholdsvis skibsradiotelefonist er foreskrevet.

4. stk. Færøernes Landsstyre kan tillade udstedelse af sønæringsbevis i henhold til bestemmelserne i den lov givning, der ophæves ifølge § 34, 2. stk., til personer, der har bestået styrmandseksamen, samt til personer, der i medfør af overgangsbestemmelserne i lov om søfartsuddannelse består nævnte eksaminer efter denne lovs ikrafttræden, dog er det en betingelse, at vedkommende har gennemgået et godkendt kursus i brandslukning og i

hevur verið á góðkendum skeiði í eldsløkking og at nýta bjargingarútgerð v.m.

§ *36.* Tann, sum, áðrenn henda lóg er komin í gildi, lógliga hevur havt fyriskipaða deks ella maskintænastu ella tænastu sum bestimaður, hevur framhaldandi rætt at gera slíka tænastu. Tað er tó treyt, at avvarðandi hevur verið á góðkendum skeiði í eldsløkking og at nýta bjargingarútgerð v.m.

2. stk. Føroya Landsstýri fær heimild til at áseta treytir fyri, hvussu sjófólk, sum nevnt í stk. 1, fær rætt at mynstra sum fulltikin skipsaistøðari.

brug af redningsmidler m.v.

§ *36.* Den, der før denne love ikrafttræden lovligt har gjort foreskreven dæks- eller maskintjeneste eller tjeneste som bedstemand, har fortsat ret til at gøre sådan tjeneste, dog er det en betingelse, at vedkommende har gennemgået et godkendt kursus i brandslukning og i brug af redningsmidler m.v.

2. stk. Færøernes Landsstyre bemyndiges til at fastsætte vilkår, hvorunder søfarende som omhandlet i stk. 1 opnår ret til udmønstring som befaren skibsassistent.

§ *37.* Fram til tann dag, tá § 21 í hesari lóg kemur í gildi, skal persónur til at kunna mynstra sum fulltikin matrósur ella dekkari hava havt tænastu á havskipum í 36 mánaðir, av hesum minst 24 mánaða dekstænastu.

2. stk. Tann, sum hevur tikið lut í grundskeiði á góðkendum sjóvinnuskúla, verður mettur at hava havt eitt samsvarandi tíðarbil av dekstænastuni, sum krevst eftir 1. stk.

§ *37.* Indtil det tidspunkt, hvor lovens § 21 træder i kraft, skal en person for at kunne påmønstres som befaren matros have gjort tjeneste i søgående skibe i 36 måneder, hvoraf mindst 24 måneders dækstjeneste.

2. stk. Den, der har gennemgået et grundkursus på en godkendt søfartsskole, anses for at have erhvervet et tilsvarende tidsrum af den i 1. stk. krævede dækstjeneste.

§ *38.* Fram til tann dagin, tá § 22 í hesari lóg kemur í gildi, skal persónur, tá ið hann skal mynstra sum fulltikin motormaður, hava havt maskintænastu á skipi í 12 mánaðir.

2. stk. Tann, sum hevur tikið lut í grundskeiði á góðkendum sjóvinnuskúla, verður mettur at hava havt eitt samsvarandi tíðarbil av teirri siglingartíð, sum krevst eftir 1. stk.

§ *38.* Indtil det tidspunkt, hvor lovens § 22 træder i kraft, skal en person for at kunne påmønstres som befaren motormand have gjort maskintjeneste i skibe i 12 måneder.

2. stk. Den, der har gennemgået et grundkursus på en godkendt søfartsskole, anses for at have erhvervet et tilsvarende tidsrum af den i stk. 1 krævede fartstid.

Viðmerkingar til uppskot um sjóvinnulóg

Tey krøv, sum sett verða til at fáa vinnubrøv eftir hesum uppskoti, eru grundað á tær broytingar, sum eru framdar sambært løgtingslóg um sjómansútbúgvingar og viðtøkur løgtingsins av STCW-sáttmálanum september 1984, har altjóða krøv eru sett um útbúgving, vinnubrøv og vaktarhald á skipum.

Tá ið manningarlógin seinast varð viðgjørd á tingi, og nýtt uppskot varð samtykt, sum var til løgtingslóg nr. 104 frá 6. november 1984, varð av arbeiðsbólkinum, sum legði fram uppskotið, mælt til at bíða við størri broytingum, eftirsum onnur lond uttan um okkum vóru við at seta broytingar í verk.

Danmark hevur við kunngerð nr. 10 frá 1. februar 1985 lýst STCW-sáttmálan at galda og framdi við lóg nr. 239 og 240, báðar frá 6. juni 1985, um manning og sjóvinnu tær broytingar, sum sáttmálin krevur. Lógin um sjómansútbúgvingar varð somuleiðis broytt 4. desember 1985.

Danmark hevur í fráboðan til IMO tann 20. januar 1981 góðkent STCW sáttmálan við fyrivarni viðvíkjandi Føroyum og Grønlandi. Sáttmálin kom í gildi 28. apríl 1984.

Hetta førir við sær, at hóast vit í Føroyum hava fylgt somu reglum um útbúgving, seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 9. januar 1986, so fáa føroyskir deksyvirmenn ikki vinnubrøv, sum eisini kunnu nýtast við donskum skipum.

Tann átekning, sum hevur verið gjørd á vinnubrøvini, er eftir boðum frá ídnaðarmálaráðnum sett úr gildi frá 1. juli 1985.

Tess vegna er neyðugt við hesum broytingum í lógini um manning og sjóvinnu, soleiðis at eftir samtykt løgtingsins verður fyrivarni viðvíkjandi Føroyum mótvegis IMO sett úr gildi og uýggj avtala verður gjørd millum landsstýrið og ídnaðarmálaráðið um javnsetan vinnubrævsins í føroyskum ella donskum skipum.

Broytingar í hesum uppskoti um sjóvinnulóg eiga at síggjast saman við uppskotinum um manningarlóg, uppskotinum um sjómannalóg og uppskot um broytingar í løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984, har nýtt krav um sjóvinnuskúla fyriliggur.

Hetta uppskot byggir á nýggj útbúgvingarkrøv fyri skipsatstøðarar, sum eru ætlaðir at inna deks- og maskintænastu.

Stýrimanspróvtøka verður hildin fyri seinastu ferð í juni 1987 og harvið vinnubrøv sum skipsførari á 2. stigi í uppskotinum fellur burtur.

Rættindi við vinnubrævi sum heimaskipari og skipari eru grundað á komandi broyting í hesum útbúgvingum, soleiðis at heimaskiparaútbúgvingin verður longd til 1 ár, meðan skiparaútbúgvingin verður longd tilsvarandi við 6 mánaðum, soleiðis at tann samlaða útbúgvingartíðin til heimaskipara og skipara verður 18 mánaðir.

Haraftrímóti fáast sambært uppskotinum um manningarlóg størri rættindi bæði í handils- og fiskiskipum.

Við 18 mánaða skiparaútbúgving fáast førararættindi á øllum fiskiskipum á øllum høvum.

Sambært uppskotinum verða treytir fyri at inna tænastu á skipum og útgáva av vinnubrøvum grundaðar á hesar útbúgvingar:

1. Sjóvinnuskúlaútbúgving
2. Dugnaskaparroyndir í sigling og motorpassing
3. Motorpassaraútbúgving
4. Heimaskiparaútbúgving
5. Skiparaútbúgving
6. Maskinist- og maskinmeistaraútbúgving
7. Víðkað maskinmeistaraútbúgving
8. Skipsføraraútbúgving
9. Skipsfjarritara- og radiotelefonistútbúgving
10. Skipskokkaútbúgving
11. Eftirútbúgving av sjófólki

Av nevndu útbúgvingum eru tær flestu møguligar í Føroyum í dag. Tær, sum ikki eru møguligar, verða við teimum framdu broytingum í løgtingslógini um sjómansútbúgving umframt komandi broytingum í øðrum lógum framdar í hesum ári.

Álitið um sjóvinnuútbúgvingina er greitt úr hondum, og verður henda útbúgving vónandi framd í hesi tingseta.

Dugnaskaparroyndir í sigling og motorpassing eru møguligar, men verða endurskoðaðar.

Motorpassaraútbúgving er fingin til vega, og byrjaði fyrsta skeiðið á Føroya Maskinskúla 2. februar 1987.

Heimaskipara- og skiparaútbúgvingin verður endurskoðað nú samsvarandi teimum rættindum, sum uppskotini um manning av skipum og sjóvinnu heimila og seta krav um. Henda útbúgving er ikki fult á hædd við krøvini í STCW-sáttmálanum og er tessvegna neyðugt at fremja broytingar. Hetta gerst við kunngerð, tá heimildin er í verandi lóg um sjómansútbúgving.

Maskinistútbúgvingin fellur væntandi burtur í 1988, men fer ein broyting at koma soleiðis, at kravd verður 3 ára útbúgvingin (uppíroknað víðkaða royndin) við møguleika at gevast eftir 1 árs roynd og broyttum sjóvinnurættindum. Tá gerst neyðugt at seta fram broytingar í hesum lógaruppskoti.

Víðkaða maskinmeistararoynd kann væntandi byrja 1. august 1987 sambært fíggjarlógini 1987.

Skipsføraraútbúgvingin er broytt seinast við løgtingslóg nr. 2 frá 9. januar 1986 og lýkur treytirnar í STCW-sáttmálanum.

Útbúgving av skipsfjarritarum er hildin uppat í Føroyum og kemur at verða sett úr gildi umleið ár 1992 sambært F.G.M.D.S.S. (Future Global Martime Distress and Safety System). Harafturímóti er radiotelefonistprógvið víðkað til eisini at umfata telex.

Skipskokkaútbúgvingin er í dag bert á grundstøði, men fyritreikingar verða gjørdar til eina skipskokkaúthúgving.

Eftirútbúgving av sjófólki er komin í fasta legu, soleiðis at møguleiki fyri trygdarskeiðum sambært STCW-sáttmálanum er til staðar.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at lógin um sjóvinnu eigur at vera skild frá manningarlógini, soleiðis at sett verða fram 2 uppskot til sjóvinnulóg og uppskot um maningarlóg.

Arbeiðsbólkurin er samdur um at mæla landsins myndugleikum til at seta á stovn serstaka sjóvinnufyrisiting fyri á tann hátt at tryggja okkara sjóvinnu og tí fólki, sum her starvast, bestu umstøður sæð frá einum tryggdarligum sjómarmiði umframt at fyrisita sjóvinnumál samsvarandi hesum innan sjóvinnulógum landsins og STCW-sáttmálanum.

Tað áliggur tí landi, hvørs flagg, skip tess føra, at seta lógir, skipanir, sáttmálaskyldur, fráboðan, eftirlit, teknisk samstarv, skrásetingar og onnur fyrisitingarlig mál í verk samsvarandi STCW-sáttmálanum.

Harumframt verður mælt til, at eitt serstakt sjóvinnuráð verður stovnað, sum umframt at vera ráðgevandi eisini skal verða kærustovnur, tá ið skip verða mannað eftir teimum krøvum og við teimum skyldum, sum hetta uppskot saman við uppskotinum um manningarlóg ásetur.

Viðmerkingar til hvørja grein sær eru hesar:

ad. § 1. pkt. 1. Eitt fiskiskip verður skrásett við havnakenningarnummari.

ad. pkt. 2. Handilsskip fevnir í hesi lóg um farmaskip og ferðamannaskip og annars um øll skip, sum ikki eru fiskiskip ella stuttleikafør.

ad. pkt. 3. Stuttleikafør eru tikin við í hesum uppskoti, tá tey annars eru nevnd í pkt. 2. Ein avgerð um, hvørt eitt skip skal metast sum stuttleikaskip ella ikki, eigur at byggja á eina serkøna meting.

ad. pkt. 4. Í mun til verandi lóg er her máliprógv tikið við, tá tað kemur fyri, at skip, hóast tey verða máld eftir 1954 ella 1969 altjóða reglunum, eisini kunnu hava máliprógv, sum hvørt land sær ásetur.

ad. pkt. 5. Løgtingslóg nr. 65 frá 6. juni 1984 um sjómansútbúgvingar fevnir við fyriliggjandi broytingum um allar í hesi lóg nevndu útbúgvingar burtursæð frá maskinist- og maskinmeistaraútbúgving, sum er ríkislóg.

ad. pkt. 6. Vard øki verður ásett nærri eftir tilmæli, sum hesin arbeiðsbólkur leggur fram.

ad. § 2. Greinin er broytt í mun til verandi § 10 og verður nú kravd siglingartíð, sum nærri verður ásett í kunngerð. Í hesum føri 6 mánaðir.

Dugnaskaparroyndin er tann, sum STCW-sáttmálin fyriskipar sum minstukrøv til skipara og vakthaldandi stýrimann á skipum undir 200 BRT (samanber STCW Reg. II/3).

Krav um sjón- og hoyrnarroynd er eisini altjóða krav.

Tað verður mett sum rímiligt, at radioútbúgving verður VHF-prógv.

Krav um at vera myndugur fylgir við rættindunum at føra skip.

Ætlanin við dugnaskaparroynd er gjørd soleiðis, at *øll*, sum ynskja tað, fáa høvi til at fáa sær eina dugnaskaparroynd, men rættindi at føra skip er treytað av hesum reglum. Soleiðis sum skipanin er eftir verandi lóg, verður førararættarin givin beinleiðis, hvørt sjónarroynd fyriliggur. Hetta merkir veruliga, at onkur fær heimild at føra skip (ferðamannaskip) 8-20 BRT umframt bestamansrættindi upp til 100 og 150 BRT uttan nakrantíð at hava verið á skipsdekki.

ad. § 3. Broytingin er heitið:

Stýrimaður á 4. stigi, sum kemur í staðin fyri núgaldandi § 11 »bestimaður við heimaskipararoynd«. Hetta vinnubræv er ongantíð útgivið, men eru í staðin givin rættindi sum heimaskipari beinleiðis.

Sambært STCW-sáttmálanum kunnu førararættindi ikki latast beinleiðis, eins og minstakrav um siglingartíð er 36 mðr. ella niðursett samsvarandi góðskriving samb. § 20 og § 37, 1. og 2. stk.

Um sertreytir fyri fiskiskip verður víst til kunngerð um kravda siglingartíð, tá ið sjóvinnubrøv verða útgivin (§ 2 og § 6).

Heimaskiparroynd merkir her 1 árs útbúgving samanborið við § 35.

Radiotelefoniprógv verður kravt (samanber viðmerkingarnar til § 18.)

ad. § 4. Siglingartíðin sum stýrimaður á 4. stigi er óbroytt sambært verandi § 12 undir heitinum »bestimaður«.

Heimarættur er óbroyttur, men aldursmarkið broytt frá 21 til 20 ár.

ad. § 5. Stýrimaður á 3. stigi svarar til »bestimaður við skipararoynd« eftir verandi lóg. Siglingartíðin verður sum viðmerkt undir § 4 í hesum uppskoti.

ad. § 6. Siglingartíðin er í mun til verandi lóg (§ 14) broytt til 24 mánaðir, harav 12 mánaðir sum ovasti stýrimaður.

Hetta verður gjørt samsvarandi størri rættindum í manningarlógini og minstukrøvunum í STCW-sáttmálanum Reg. 11/2 og Reg. 11/3.

ad. § 7. Við broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving er stýrimannapróvtøka dottin burtur, og er sostatt bert talan um skipsføraraútbúgving og siglingartíð ásettar við kunngerð (§ 2) og eftir teimum fyriskipanum, sum STCW-sáttmálin ásetur.

ad. § 8. Siglingartíðin sum stýrimaður á 2. stigi verður sett til 12. mánaðir. Broytingin frá verandi lóg (§ 16) stavar frá broytingunum í hesi § 7.

ad. § 9. Eftir hesari grein er hert talan um eitt skipsførarabræv við ásetingum beinleiðis eftir STCW-sáttmálanum. Hetta merkir, at skipsførarabræv á 2. stigi fellur burtur samanborið við broytingina í § 7, men rætturin, sum hevur verið latin eftir galdandi lóg (§ 17), kann hvørt framvegis verða givin sambært ásetingunum í § 35, 4. stk.

ad. § 10. Dugnaskaparroynd í motorpassing er nýggj grein í hesi lóg. Samanber viðmerkingarnar til § 2 og manningartalvurnar.

ad. § 11. Eftir verandi lóg er fyriskipað motorpassari, uttan at henda útbúgving hevur verið tøk.

Í dag fer fram motorpassaraútbúgving sambært ásettari kunngerð, og verður sum nýtt uppskot vinnubræv sum motorpassari likið við.

ad. § 12. Óbroytt í mun til verandi lóg (§ 21).

ad. § 13. Óbroytt í mun til verandi lóg (§ 22), tó er aldursmarkið broytt til 18 ár.

ad. § 14. Óbroytt í mun til verandi lóg (§ 23).

ad. § 15. Óbroytt í mun til verandi lóg (§ 24), tó soleiðis at aldursmarkið (25 ár) fellur burtur.

ad. § 16. Óbroytt í mun til verandi lóg (§ 25)

ad. § 17. Víst verður til STCW-sáttmálan Reg. III/4 pkt. 4.

ad. § 18. Samsvarandi STCW-samtyktini er fyriskipað sum prógtøkukrav, at heimaskiparar skulu hava »begrænset certifikat« sum radiotelefonistur, meðan skiparar og stýrimenn skulu hava alment prógv »generelt certifikat« sum radiotelefonistur. STCW-samtyktin hevur tó bert eitt slag av prógvi sum skipsradiotelefonistur, sum fæst við hesum báðum nevndu sum grundarlag.

Í sambandi við manningaásetanir verður mælt til bert at nýta eitt slag av prógvi, nevniliga skipsradiotelefonistur.

Útbúgvingarkravið er í dag broytt til eisini at fevna um skipatelex samsvarandi altjóða reglum.

Kravið um, at avvarðandi, sum biður um vinnubræv §§ 3, 5 og 7, verður hervið flutt frá at vera prógtøkukrav til ístaðin at vera krav, tá ið vinnubræv verður útgivið.

Prógv sum skipsfjarritari er við at ganga út, tá henda útbúgving væntast at detta burtur sambært ásetingunum í F.G.M.S.S. (Future Global Martime Distress and Safety System). Tó er tað likið við her, so leingi hetta krav er í skipunum.

Trygdarútbúgving sum her nevnd verður mælt til at hava á komandi sjóvinnuskúla.

ad. § 19. Krav um vinnubræv sum skipskokkur er nýtt og hevur ikki verið við føroyskum skipum fyrr, men hetta er í tráð við ætlaðu útbúgvingarmøguleikarnar her á landi og skal síggjast saman við manningarlógini.

ad. § 20. Matrósur ella dekkari verður at skilja soleiðis, at ein og hvør matrósur ella deksmaður við handilsskipi, ferðamannaskipi ella fiskiskipi kemur undir hesa reglu, treytað av at hann siglir við føroyskum skipi og sambært starvsavtalu, sum er gjørd her á landi.

Grundskeiðið á sjóvinnuskúla verður kravt samsvarandi uppskotinum um broyting í løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984, soleiðis at sjóvinnuskúlin verður stovnaður.

Í teimum førum, sum nevnt í 3. stk., har undantøk verða givin frá kravinum um sjóvinnuskúla, verður krav sett um skeið í eldsløkking og nýtslu av trygdarútgerð. Hetta skeið verður skipað á sjóvinnuskúlanum.

ad. § 21. Framdar eru broytingar frá verandi (§ 27 og § 28) á tann hátt, at um-
22-23. framt skipanina við matrósi ella dekkara og motormanni verður uppskot tikið við um skipsatstøðarar sum greitt frá í byrjanini av hesum viðmerkingum. Siglingartíð sum nevnt í 3. stk. merkir tann tíð, sum fer út um ta vanligu fyriskipaðu sigling (5 mðr.) á teimum skúlaskipum, ið nýtt verða til slík endamál.

ad. § 24. Krav um gildi sjóvinnubrævsins er ásett í STCW-sáttmálanum Reg. III/5, og verða nærri reglur ásettar í uppskotinum um kunngerð við heimildum í 2. stk.

ad. § 25. Víst verður til STCW Reg. V/1, Reg. V/2 og Reg. V/3 umframt somu kunngerð, sum nevnt undir § 24.

ad. § 26. STCW-sáttmálin fyriseitir, at førararættindi ikki mugu gevast, uttan so at siglingartíð sum stýrimaður er fingin fyrst. Sambært § 20 í verandi lóg verður førararættur sum skipari framvegis latin teimum, sum fáa útskrivað vinnubræv sambært § 35, 4. stk. í hesum uppskoti.

ad. § 27. Víst verður til somu skipan, sum er ásett í STCW-sáttmálanum. 2. stk. fevnir um undantaksloyvi, sum sambært STCW (VIII) bert mugu gevast í mesta lagi 6 mánaðir. Undantaksloyvi mugu ikki latast skipara ella maskinstjóra, uttan so at talan er um »force majeure«.

4. stk. er ein vanlig regla í teimum førum, hetta gerst neyðugt.

ad. §§§
28-29-30. Víst verður til verandi lóg (§ 30).

ad § 31. Rætturin at føra skip er tengdur at heimarættinum.

ad. § 32. Eftir viðtøkunum í STCW-sáttmálanum er málieindin, sum liggur til grund fyri ræltindunum, ásett í skrásetingartonsum brutto.

Við tað at henda málieind kann broytast soleiðis, sum IMO er við at gera, og sum væntast at vera broytt umleið ár 1994, er tað ein fyrimunur, at landsstýrið fær í hesum uppskoti heimild at áseta onnur tonsamørk samsvarandi hesari grein.

ad. § 33. Henda grein ger tað møguligt hjá landsstýrinum at lata sjóvinnufyrisitingina ella annan líknandi stovn taka sær av teimum ásetingum, sum hetta uppskot til lóg heimilar. Avgerðir av hesum slag eiga at siggjast sum liður í einum nýmótans bygnaði innan sjóvinnufyrisiting, heruppií útbýti av umsiting við ábyrgd.

ad. § 34. Eftirsum STCW-sáttmálin er samtyktur av løgtinginum, kann lógin fáa gildi beinanvegin. Tó skal viðmerkjast, at tá ið lógin er komin í gildi og fyrivarni mótvegis IMO sett úr gildi, skulu øll skjøl, sum eru knýtt at reglunum í hesi lóg og manningarlóginni, verða fráboðað IMO um góðkenning innan 3 mánaðir (samanber STCW XIV).

2. stk. fevnir um tann partin av verandi manningarlóg, sum við gildi av hesari lóg verður settur úr gildi.

ad. § 35. Vinnubrøv útgivin eftir verandi lóg heimila innihavara sama rættindi sum higartil.

Við teimum víðkaðu rættindum, sum heimaskipara- og skiparaútbúgvingin heimilar sambært uppskotinum um manningarlóg, verður við hesum skilt ímillum útbúgvingina áðrenn 1. juli 1982 og eftir, við tað at tann, sum áðrenn 1. juli 1982 hevur lokið heimaskipara- ella skiparaútbúgving, bert fær rættindi samsvarandi teirri lóg, sum fer úr gildi.

2. og 3. stk. geva framhaldandi rætt til at inna tænastu, sum er fyriskipað í verandi lóg.

4. stk. gevur heimild til útgávu av sjóvinnubrøvum til teirra, sum hava stýrimannaroynd samsvarandi verandi lóg. Tó er tað ein treyt, at avvarðandi tekur lut. í fyriskipaðum skeiðum.

ad § 36. Har sum serskilt sertifikat krevst til brúgvatænastu ella maskintænastu, kann fyrisitingin útskriva hesi, tá ið treytirnar í hesi grein eru loknar.

2. stk. sipar til serstaka kunngerð til at mynstra sum fulltikin atstøðari.

ad. § 37 -38 Henda skipan verður at galda so leingi, tað ikki er avgjørt, nær henda lóg fær gildi sambært § 34, og nær krøvini í § 21 og 22 fáa gildi.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið hin 28. mars 1987. Uppskotið snýr seg um tær broytingar, sum millumtjóða sáttmálar í sjóvinnumálum gera neyðugar eisini í føroyskari sjóvinnulóggávu.

Í fráboðan til IMO hin 20. januar 1981 góðkendi Danmark STCW-sáttmálan við fyrivarni viðvíkjandi Føroyum og Grønlandi. Sáttmálin kom í gildi 28. apríl 1984. Løgtingið góðtók hann í september 1984.

At tilhoyrandi fylgilógir ikki hava verið gjørdar, hevur skapað trupulleikar hjá føroyskum deksyvirmonnum, sum ikki longur fáa vinnubrøv við donskum skipum.

Við 1. viðgerð hin 8. apríl 1987 varð málið beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Rættarnevndin heldur málið vera so umfatandi, at hon eigur at fáa stundir at viðgera tað meira gjølla, enn møguligt er bert fáar dagar fyri tingslit.

Rættarnevndin mælir til, at uppskot til løgtingslog um sjóvinnu verður viðgjørt framhaldandi í rættarnevndini, sum leggur fram álit í málinum í ólavsøku tingsetuni. Hesum samsvarandi setur nevndin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur rættarnevndini at viðgera uppskot landsstýrisins um løgtingslóg um sjóvinnu sum millumtinganevnd og at leggja málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskotið til samtyktar frá rættarnevndini samtykt við 27-0 atkvøðum.

116. Vegir og lendingar

Ár 1987, hósdagin 9. apríl legði samferðslunevndin fram soljóðandi

Álit

Samferðslunevndin hevur viðgjørt tær o.u. 200 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

I. *Vegir*

Á fíggjarløgtingslógini eru settar av undir gr. 13.1 108,5 mió. kr. til vegagerðir, umsiting av landsvegunum o.a.

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyvi sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

A. til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra:

harumframt til brýr, ferjulegur o.a.	87.248.670 kr.
Bundið í ikki nýttum játtanum o.u.	14. 831.330 --
Til niðanfyri nevndu vegagerðir	6.420.000 —
	108.500.000 kr.

Kommuna	til	Studningur ¾ av kr.
Svínoyar	— vegin út til bátahylin	100.000
	— vegin eystur í Hagan	100.000
	— dyrkingarveg út á Dal	50.000
Hvannasund	— bygdavegin í Norðdepil	100.000
	bygdavegin í Hvannasundi	100.000
Viðareiðis	— Dulavegin	100.000
	— Veg inni í Dølum	100.000
Kunoyar	— vegbrúgv um Skarðdalsá	100.000
	— veg norður á Garðin í Haraldssundi	100.000
Mikladals	— dyrkingarveg niðan á Háls	150.000
Húsa	— veg til íbúðarøki á Húsum	150.000
Elduvíkar	— Umvæling av dyrkingarvegi frá kirkjugarðinum og eyc.	100.000
Fuglafjarðar	— veg til smoltstøðina á Hellum	100.000
	— niðurgongd í Góðadal	50.000
	— veg til idnaðar- og sethúsaøki á Kambsdali	100.000
Gøtu	— íbindingarveg í landsvegin í Syðrugøtu	150.000

Runavíkar	— íbinding og húsavegur í Søldarfriði — úr Klova til Marknánna	100.000
	— umbygging av bygdarvegi í Rituvík	100.000
	— veg oman á Kópasker	100.000
Nes	— vegin Nes-Toftir	100.000
	— — í Lágabø á Toftum	100.000
Skála	— búsetingarveg úti á Fløtu	150.000
	— — í Sjóvartúni	75.000
	— — í Gamla Gerði	75.000
Sjóar	— útstykkingarveg Inman Glyvur	100.000
	— — uppi á Fløtum	100.000
	— nýgerð av vegi til smoltstøð á Selatrað	75.000
Sunda	— útstykkingarvegir við Norðskála	100.000
	— — úti á Oyri	75.000
	— — á Oyrarbakka	75.000
Eiðis	— bústaðarveg í Svínáum	100.000
	— bústaðarvegir á Eiði	100.000
	— dyrkingarveg við Ljósá	75.000
Gjáar	— vegbrúgv við Hulduheyggin	150.000
Funnings	— gerð av bygdavegnum	150.000
Haldarsvíkar	— bústaðarveg í Haldarsvík	75.000
	— — í Langasandi	75.000
Hósvíkar	— veg til nýggjar útstykkingar	150.000
Kollafjarðar	— bústaðarvegir	150.000
Kvívíkar	— breiðking av vegi út á Nesi	50.000
	— — — brúgv um Válagil	50.000
	— ovara veg	100.000
	— veg út á Stallagjógv	100.000
Argja	— dyrkingarveg í Syðradali	100.000
	— eykajáttan til veg til smoltstøð í Norðradali	100.000
Kirkjubøar	— útstykkingarveg undir Borgarhálsi á Velbastað	150.000
	— veg til nýggja útstykking í Kirkjubø	75.000
Hests	— kirkjugarðsvegin	100.000
Nólsoyar	vegirnir norður á Boðan	75.000
	— vegin niðan á Brekkuna	75.000
	— vegin út í Hvannaskarð	75.000
Miðvágs	— veg til nýtt sethúsaøki á Vatnsoyrum og brúgv um Heimarugjógv	100.000
	— veg oman fyri Kirkjar	75.000
	— veg til sethúsaøkið við Týkarheygg	100.000
Sørvágs	— Úttriðingsvegin	100.000
	— vegin »r«	75.000
	— Húsadalsvegin n. til brunnar	100.000

Bíggjar	— ábøtur á vegin inni í bygdini	75.000
	— vegin n.f. bygdina í Gásadali	75.000
Sands	— vegin í Trøðum	100.000
	— Søltuvíkarvegin	100.000
	— veg n.f. og ey.f. Sandsvatn	50.000
	— veg til Skálsafjørðing	150.000
Skopunar	— brúgv um Stóra	100.000
	— Kirkjugarðsvegin	50.000
	— vegin oman í Byrgið	100.000
Skálavíkar	— vegbrúnna niðri á Mol	150.000
Skúvoyar	— veg Norður á Stiggj	60.000
Hvalbiar	— vegin til Hvalbiar skúla	150.000
	— veg o.f. húsini í Leirum	100.000
	— veg í Rókatrøðna	100.000
	— dyrkingarveg ey. í eystara bøin í Sandvík	100.000
	vegin v. á Røðina í Sandvík	150.000
Tvøroyrar	— útstykkingarveg í Heiðunum	150.000
Hovs	— veg suður til ídnaðaroki	75.000
	— veg til sethúsabygging	75.000
	vegin o.f. skúlan	75.000
Porkeris	— veg vestur á Hól	75.000
	— veg vestur í Dal	75.000
	— veg út á Gráansvíkshellur	75.000
Vágs	— gongubreyt og parkeringsplass við posthúsið og skúlan í Vági	150.000
	— niðaru brúgv um Gjógvará	100.000
	— vegin inni á Bakka	100.000
	— dyrkingarveg til Fámarákassarnar	100.000
Sunnbiar	— veg úr landsvegi í Hamrabyrgi	150.000
	— veg til grundøki í Lopra	75.000
	— veg til grundøki í Sunnba	100.000
	Tilsamans ... % av kr.	8.560.000
	=	6.420.000

II.

Lendingar:

Játtanir fyri fíggjarárið 1987, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

Kommuna	til	Studningur ¾ av kr.
Fugloyar	Vegin niðan frá lendingini á Skorðagjógv á Kirkju (4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Svínoyar	Bátahyl í Glógvansund (2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	600.000
Hvannasunds	Atkomuveg og planering av havnarøki á Norðtoftum (5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
	Leingving av bryggjuni í Norðdepli (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	400.000
	Ábøtur á »Nýggjubrúgv« o.a. í Saudoyarbugi (Viðareiðis og Hvannasunds kommunur í felag) (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	250.000
Klaksvíkar	Bátahyl á Borðoyarvík (5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	400.000
	Bátahyl á Borðoyarvík (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	700.000
	lending í Ánunum (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	200.000
Kunoyar	Bátahavn n.f. lendibrúnna í Haraldssundi (2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	200.000
Húsa	Atløguplass í s.v. rætt á Blanka Skála (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	50.000
	Planering av øki í Knúksdali (2. ársgjald av 3. ára játtan) í gerð	250.000
Elduvíkar	Bátahyl í Funningsfirði (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Bátahyl í Funningsfirði (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
Oyndarfjarðar	Deksbátahavn í Oyndarfirði (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	300.000
Uglafjarðar	Smábátahavn (3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	250.000
	Smábátahavn (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
Gøtu	Bátahyl undir Gøtueiði (3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	200.000

	Bátahyl í Norðragøtu	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	100.000
Runavíkar	Bátahyl á Líknargøtu í Saltangará	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
	Áhøtur á lendingina í Rituvík	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
	Hylin og dráttin í Rituvík	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
	Bryggjubygging á Bakka á Glyvrum	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	400.000
	Lending í Rituvík	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
	Bátahyl á Glyvrum og atkomuveg	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Lending í Lamba	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	250.000
	Lending í Rituvík	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	200.000
Nes	Bátahyl í Oyrunum á Toftum	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000
	Brimskaðar	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	200.000
	Deksbátahavn og bátahavnina í Oyrunum	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	150.000
	Bátadrátt í Oyrunum	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	150.000
Skála	Bátahyl í Skálafirði	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Sjóar	Veg og lending innan Glyvur	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	125.000
	Lending og atkomuveg innan Glyvur	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Lendingina á Morskranesi	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	100.000
Sunda	Bátahyl á Oyrarbakka	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
	Meirkostnað viðv. skeljavirkinum og til drátt norðan fyri virkið	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	150.000
	Veg í sambandi við øki til fóður- og slaktihús s.f. havnina á Oyri (í Grønisáum)	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	200.000

Eiðis	Atløgupláss til útróðrarbátar á Eiði	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Bátabrúgv á Eiði	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	100.000
	Lendingina við Ljósá	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
Haldarsvík	Veg út á lendingina í Tjørnuvík	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	100.000
Hvalvíkar	Útbygging av bryggjuni í Hvalvík	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	600.000
	Havnaarbeiði, eykajáttan og til vatnveiting	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	300.000
	Vatnveiting til havnarlagið	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
Hósvíkar	Havnarøki og atløgusíða	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	300.000
	Bátahylin	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
Kvívíkar	Bátahavnin í Kvívík	
	(6. ársgjald av 7 ára játtan) bygt	600.000
	Bátahavnina	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Brimskaðar	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
Vestmanna	Bátahylin inni á Fjørð	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
Tórshavnar	Bátahylin í Kaldbak	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Argja	Bátahavn	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
Kirkjubøar	Lendingina á Velbastað	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	300.000
	Lendingina á Velbastað	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000
Nólsoyar	Útbygging av havnarlagnum	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	300.000
Miðvágs	Øking um bátahylin	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
Sørvágs	Bátahylin	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	150.000
	Bátahylin	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	250.000

	Bátahylin	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	200.000
	Regulering av grótkasti, el- og vatnveiting í bátahavnini	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
Mykines	Bøting um lendingarviðurskiftini	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	500.000
Sands	Havnina	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	600.000
	Atløgusíðu til bátar	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	200.000
Húsavíkar	Lendingina á Skarvaskeri	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
	Brimskaða í Húsavík (Skarvasker)	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
	Lendingina í Dali	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Bátahavn innan fyri Skarvasker	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	400.000
Skúvoyar	Bátahyl	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	500.000
Hvalbiar	Ábøtur á havnina í Nesi og atløgubryggju í bátahylinum í Nesi	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	500.000
	Ábøtur á havnarviðurskiftini í Nesi	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	250.000
	Lending í Nesi	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	700.000
	Meirkostnað og bátasíðu í Nesi	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Bryggju í Sandvík	
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	200.000
Tvøroyri	Bátahylin undir Tvørábakka	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
	Bátahylin undir Tvørábakka	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	200.000
Fámjins	Lending og brimverja	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
	Leinging av brimgarðinum	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	200.000
Hovs	Portur ella grótkast og teymar	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	75.000

	Havnarportur og hekking og leinging av brimgarði	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	450.000
	Lending og veg í Tjaldavík	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	250.000
Porkeris	Veg til grótkast	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Vágs	Ábøtur á lendingina á Nesi	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	50.000
	Bátahylin	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	200.000
Sumbiar	Bátahyl í Sumba	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	400.000
	Bryggjugerð í Lopra	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	500.000
	Bátahyl í Pollinum	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
	Tilsamans ¾ av 21.000.000	
	=	15.750.000

Játtað frammanundan fyri 1987 til lendingar		15.750.000 kr.
ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31.12.1986		30.772.571 kr.
		46.522.571 kr.
Av játtanum fyri 1987 er goldið		2.301.042 kr.
		44.221.529 kr.
Í grunni pr. 31.12.1987	24.771.297	
játtað 1987	26.400.000	51.171.297 kr.
til góðar		6.949.768 kr.

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

		Uppskot ¾ av kr.
Kommuna	til	
Viðareiðis	— vegin undir Leiti	
	¾ av 150.000/árið í 4 ár	150.000
Hvannasunds/	— leingjan av atløgubryggjuni undir frostvirkinum	
Viðareiðis	¾ av 400.000/árið í 5 ár	400.000
Klaksvíkar	— bátaarmar í Klaksvík	
	¾ av 140.000/árið í 3 ár	140.000
	— bátahavnina á Borðoyarvík	
	¾ av 650.000/árið í 8 ár	650.000
Kunoyar	— bátahavn í Haraldssundi	
	¾ av 150.000/árið í 6 ár	150.000
Oyndarfjarðar	— deksbátahavnina	
	¾ av 250.000/árið í 6 ár	250.000
Fuglafjarðar	— smábátahavnina	
	¾ av 100.000/árið í 6 ár	100.000
Gøtu	— bátahylin undir Gøtuciði	
	¾ av 200.000/árið í 6 ár	200.000
Runavík	— lendingina í Lamba og veg oman	
	¾ av 100.000/árið í 5 ár	100.000
	— bátahylin og lendingarveg á Bakka, Glyvrum	
	¾ av 200.000/árið í 6 ár	200.000
Nes	— deksbátahavnina og bátadrátt í Oyrunum	
	¾ av 250.000/árið í 8 ár	250.000
Sjóar	— útbygging av bátahylinum í Hoygsstøð	
	¾ av 150.000/árið í 4 ár	150.000
Sunda	— bátahylin á Oyrarbakka	
	¾ av 200.000/árið í 6 ár	200.000
	— grótkastið úti á Oyri	
	¾ av 250.000/árið í 6 ár	250.000
Eiðis	— bátahylin við Ljósá	
	¾ av 200.000/árið í 3 ár	200.000
Gjáar	— ábøtur á lendingina	50.000
Elduvíkar/	— leinging av atløgusíðuni í Funningsfirði	
Funnings	¾ av 200.000/árið í 4 ár	200.000
Funnings	— lendingina í Funningi	
	¾ av 100.000/árið í 3 ár	100.000

Haldarsvíkar	— áhøtur á atløgusíðu í Vík	
	¾ av 200.000/árið í 4 ár	200.000
	— lendingina í Tjørnuvík	100.000
Hvalvíkar	— betongdekk o.a. á keiøkið	
	¾ av 300.000/árið í 6 ár	300.000
Hósvíkar	atløgubryggju fram við vegnum í bátahylinum í Hósvík og stoyping av dekki	
	¾ av 200.000/árið í 6 ár	200.000
Kollafjarðar	— leinging av ytra armi o.a. á bátahylinum við Sjógv	
	¾ av 150.000/árið í 6 ár	150.000
	— veg til havnarøkið s.f. Oyruna	
	¾ av 150.000/árið í 6 ár	150.000
Vestmanna	— bátahylin inni á Fjørð	
	¾ av 200.000/árið í 7 ár	200.000
Kirkjubøar	— leingjan av brimgarðinum o.a. á Velbastað	
	¾ av 200.000/árið í 6 ár	200.000
Hests	— vegin frá lendingini niðan á bakkan í Koltri	
	¾ av 200.000/árið í 2 ár	200.000
Sandavágs	— bátahavn	
	¾ av 800.000/árið í 8 ár	800.000
Miðvágs	— víðkun av bátahylinum	
	¾ av 150.000/árið í 7 ár	150.000
Sørvágs	— dýping av bátahyli	
	¾ av 150.000/árið í 5 ár	150.000
Bíggjar	— úbatur á lendingina og trappur niðan í Bø	
	¾ av 50.000/árið í 2 ár	50.000
Sands	— atløgusíðu til bátar	
	¾ av 200.000/árið í 6 ár	200.000
Skálavíkar	— veg út eftir Bakka	
	¾ av 100.000/árið í 2 ár	100.000
	— dekkið ey.f. fiskahúsið n. á Møl (brimskaði)	
	¾ av 150.000/árið í 4 ár	150.000
Húsavíkar	— lendingina á Skarvaskeri	
	¾ av 300.000/árið í 6 ár	300.000
Hvalbiar	— atløguna í Tjørnunesi	40.000
	— bátaspæl á Nesi	
	¾ av 50.000/árið í 2 ár	50.000
	— leingjan av bryggjuni í Sandvík	
	¾ av 350.000/árið í 6 ár	350.000
	— lendingina í Nesi, stoyping av dekki v.m.	
	¾ av 150.000/árið í 4 ár	150.000

Fámjins	— brimverju og brimskaða	
	¾ av 75.000/árið í 6 ár	75.000
Tvøroyri	— bátahylin undir Tvørábakka	
	¾ av 100.000/árið í 2 ár	100.000
	— bátahylin í Trongisvági	
	¾ av 100.000/árið í 2 ár	100.000
	— øki við Bærentshavið (við bátahavnina)	
	¾ av 100.000/árið í 4 ár	100.000
Hovs	— lendingin í Tjaldavík	
	¾ av 100.000/árið í 4 ár	100.000
Vágs	— øki við bátahavnina í Oyrunum	
	¾ av 250.000/árið í 4 ár	250.000
Sunnbiar	— brimskaða o.a. í Pollinum	
	¾ av 300.000/árið í 7 ár	300.000
	— atløgusíðu til bátar, planering og stoyping undir neystum og bátadrátt í Lopra	
	¾ av 100.000/árið í 6 ár	100.000
	— brimverju av smoltstøðini í Víkarbyrgi og veg til hana	
	¾ av 200.000/árið í 3 ár	200.000
	¾ av kr.	9.255.000
	= kr.	6.941.250

B. *Viðmerking til umsóknir um bátahyl í Skúvoy og Svínoy*

Sum kunnugt er talan um 75% ístudningi til vegir/lendingar, ið fáa stuðul av avvarðandi kouti. Nú hava so Skúvoyar og Svínoyar bygdaráð søkt um, at stuðulsprosentið í sambandi við bátahyljaprojekt verður hækkað úr 75% til 85%, soleiðis at partur kommunanna verður 15% og partur landsins 85%.

Grundgeving kommunanna er, at 25% í teirra lut er ein ov tung fíggjarbyrða.

Nevndu bátahyljar verða mettir til ávikavist 8 mió. kr. og 9 mió. kr.

Áður hava umrøddu kommunur fingið játtað ávikavist 75% av 3 mió. kr. og 75% av 3,6 mió. kr.

Landsverkfrøðingurin upplýsir, at eftir ætlan verður farið undir arbeiðið í sambandi við bátahylin í Svínoy einaferð summar, og kemur arbeiðið hvørga staðni at verða seinkað, um bíðað verður við meirjáttan til komandi fíggjarár.

Hvat prosentsatsinum viðvíkur, so ásannar nevndin, at 25% av nevndu upphæddum í kommunanna part er ein ov tung fíggjarbyrða fyri Svínoyar og Skúvoyar kommunur.

Sostatt er ein samd nevnd av tí áskoðan, at rímiligt er, at broyting á hesum øki verður at fremja, soleiðis at lætt verður um fíggjarbyrðuna hjá nevndu kommunur — og øðrum útoyggjakommunum í líknandi støðu.

Nevndin vil tí kunna tingið um, at hon frá komandi fíggjarári er sinnað í staðin fyri 75% at játta 85% í studningi til umrøddu projekt í nevndu kommunum.

C. *Viðvíkjandi dálking stavandi frá húsarhaldum, virkjum o.o.*
Tá ið ávísar kommunur í umsókn teirra hava gjørt vart við ta støðugu dálking av sundum og firðum, sum ger seg galdandi, hevur nevndin hildið tað verið rætt at tikið henda spurning við í hetta álit.

Dálking av sundum og firðum hevur sum kunnugt ymiskan uppruna, og stavar ein av hesum frá tí, sum dagliga reunur frá virkjum, húsarhaldum og øðrum bygningum út á sjógv.

Vitandi, at Landsverkfrøðingurin hevur kortlagt allar kloakkir í landinum, er nevndin av tí áskoðan, at mest natúrligt er, at hesin stovnur kemur við tilráðing um, hvussu dálking stavandi frá húsarhaldum, virkjum o.ø. bygningum kann minkast.

Sostatt setir nevndin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at heita á Landsverkfrøðingin sum skjótast at gera uppskot um og kostnaðarmeting av tiltøkum, ið minka um dálkingina av sundum, firðum og vøtnum, sum kemur frá húsarhaldum, virkjum og øðrum bygningum.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av samferðslunevndini tann 9. apríl 1987 og undir 1. viðgerð tann 10. s.m. beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið í óbroyttum líki.

2. viðgerð 13. apríl 1987. Uppskotið í álitinum samtykt við 28-0 atkvøðum, og uppskotið til samtyktar viðvíkjandi kostnaðarmeting av tiltøkum at minka um dálking v.m. samtykt við 26-0 atkvøðum.

117 Um at banna, at roykt verður á almennum støðum

Ár 1987, fríggjadagin 27. mars legði formaðurin vegna almanna- og heilsunevndina fram soljóðandi

Álit

Málið snýr seg um, at felagið Heilbrigdi hevur vent sær til løgtingið og biðið um, at tað við lóg verður bannað at roykja á almennum støðum. Í brævinum verður sagt, at tað serliga eru tey, ið ferðast við strandferaskipum landsins, ið hava ampa av roykinginí. Summi av ferðafólkunum hava hótt við ikki at gjalda ferðaseðilin av hesi orsøk.

Felagið leggur eisini við brævv frá Frants Restorff, Tórshavn, ið eisini biður um, at Føroya Løgting við lóg bannar, at roykt verður á almennum støðum.

Nógv er hent á roykiøkinum seinastu árini. Og nógvastaðni er tað vorðið støðan, at stig verða tikin frá almennari síðu at tryggja roykfrítt umhvørvi. Grannalondini, einamest Ísland og Svøríki, hava verið sera framarlaga á hesum øki, meðan vanligi politikkurin í Danmark hevur verið, at upplýsast skal um vandar og avleiðingar av at roykja — bæði aktiv og passiv royking — men ikki við lóg at skorja nakað.

Í Danmark er støðan broytt nú, og stjórnin hevur sett fram uppskot um, at ikkiroykjarar verða vardir ímóti umvegisroyking. Í almenum bygningum og bilum og bussleiðum skal roykjarin gevast við at roykja, um ein av teimum, ið er hjá, biður um tað. Hetta er partur av teirra lóg um roykfrítt umhvørvi. Hildið verður, at henda lóg verður samtykt í vár.

Almanna- og heilsunevndin hevur viðgjørt spurningin og ásannar, at royking eins og umvegisroyking er eitt av størstu heilsuligu vandamálunum, ið eru. Við tað at felagið Heilbrigdi arbeiðir við hesum máli og hevur staðið fyri teimum upplýsingarkampanjum, ið førdar hava verið í Føroyum, og so statt er mest virkið á hesum øki, heldur nevndin tí hyggjuráðini vera at biðja Heilbrigdi gera uppskot til lóg um at bauna royking á almennum støðum.

Tað er ein samd nevnd, ið setir soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið biður landsstýrið heita á felagið Heilbrigdi um at koma við uppskoti til lóg á tubbaksøkinum.

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í heilsu- og almannanevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit II

Í áliti dagf. 27. mars 1987 setir ein samd almanna- og heilsunevnd fram soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið biður landsstýrið heita á felagið Heilbrigdi um at koma við uppskoti til lóg á tubbaksøkinum.

Tá málið var til 1. viðgerð hin 31. mars 1987, vísti tað seg, at tingmenn ikki kundu góðtaka, at heitt varð á privatan felagsskap um at gera ávíst arbeiði.

Málið er tí aftur viðgjørt í almanna- og heilsunevndini, og tað er ein samd nevnd, ið setir soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið biður landsstýrið bera so í bandi, at gjørt verður eitt uppskot til lóg á tubbaksøkinum.

2. viðgerð 10. apríl. Málið varð afturbeint í almanna- og heilsunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit III

Tá álit II skuldi til atkvøðugreiðslu aftan á 2. viðgerð, vísti tað seg, at uppskotið til samtyktar var til at misskilja.

Talan er um, at tað við lóg skal bannast, at roykt verður á almennum støðum. Hetta kann gerast antin við sjálvstøðugari lóg og/ella sum uppískoyti til verandi tubbakslóg.

Hvat snøggast er, verða tey lógakønu í umsitingini at avgera. Í tráð við hetta setir ein samd almanna- og heilsunevnd fram soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at bera so í bandi, at bannað verður at roykja á almennum støðum.

Framhaldandi 2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið til samtyktar í áliti III varð samtykt við 17-0 atkvøðum.

118 Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna

Ár 1987, fríggjadagin 3. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna.

lagtingslov om bygning af lokaler til Fiskeribiologisk Laboratorium.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at taka upp lán til bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna uppá tilsamans 17,5 mió. kr.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at optage lån til bygning af lokaler til Fiskeribiologisk Laboratorium på ialt 17,5 mio. kr.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Á fundi tann 15. januar 1987 samtykti landsstýrið, at farast skuldi undir at byggja fiskirannsóknarstovuna.

Í grunn vóru á fíggjarløgtingslógini fyri árið 1. apríl til 31. desember 1985 settar 2 mió. kr. av, á fíggjarløgtingslógini fyri árið 1986 vóru settar 2 mió. kr. av, og á fíggjarløgtingslógini fyri árið 1987 eru settar 3,5 mió. kr. av.

Kostnaðarmetingin tann 26. mars 1987 frá arkitektunum er	kr. 24.228.260	
Landsstýrið lagt uppfyri	— 771.740	kr. 25.000.000
Í byggigrunn eru avsettar tilsamans		kr. 7.500.000
Sostatt er neyðugt at læna		kr. 17.500.000

Byggitíðin er mett til 1½ ár.

Í tann mun, peningur verður játtaður grunninum í byggitíðini, verður lántøkan tilsvarandi minni.

1. viðgerð 3. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. apríl 1987 og undir 1. viðgerð 6. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og er í nevndini somja um, ov stutt tíð er til at viðgera málið, og má tí nevndin biðja um loyvi til at viðgera málið viðari í fíggjarnevndini og leggja tað aftur fyri tingið í ólavsøkutingsetuni.

Ein samd fíggjarnevnd setir sostatt fram

Uppskot

til

samtyktar

Tingið áleggur fíggjarnevndini at arbeiða viðari við málinum um bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og at leggja málið fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni 1987.

2. viðgerð 9. apríl 1987. Við 17-0 atkvøðum varð málið aftur beint í fíggjarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit II

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. apríl 1987 og undir 1. viðgerð tann 6. í sama mánaði beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og ein samd nevnd setir fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins.

Í § 1 verður orðið: »Landsstýrinum« broytt til orðini »Landstýrinum saman við Fíggjarnevnd Løgtingsins«.

I § 1 ændres ordet: »Landsstyret« til ordene: »Landsstyret sammen med Lagtingets Finansudvalg«.

Framhaldandi 2. viðgerð 14. apríl. Broytingaruppskot til § 1 samtykt við 25-0 atkvøðum. § 1 soleiðis broytt samtykt við 24-0 atkvøðum. § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Við 24-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð. Uppskotið til samtyktar burturdottið.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 308-9-3. Lóg nr. 45 frá 5. mai 1987.

119 Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág

Ár 1987, týsdagin 31. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi skriv:

Føroya Løgting

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið til løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág í viðlagda álitti (s. 4-33) frá ráðleggingarnevndini fyri apoteksverkið, mars 1987, við hesum broytingum:

Uppskot

1. Í § 5, 1. stk. gongur seinra punktum út.
2. Í § 6 gongur seinra punktum út.
3. Í § 7, 1. stk. ganga numrini 1, 2 og 3 út, numrini 4 og 5 verða ávikavist nummar 1 og 2.
4. §§ 8, 9, 10, 11, 3. stk., og 58 ganga út.
5. Øll § nr. 11 og hægri lækkað 3 nr.
6. Í øllum ávísingum í greinum til § nr. 11 og hægri verður § nr. lækkað við 3 nr.

1. I § 5, stk. 1 udgår sidste punktum.
2. I § 6 udgår sidste punktum.
3. I § 7, stk. 1 udgår numrene 1, 2 og 3, numrene 4 og 5 bliver henholdsvis nummer 1 og 2.
4. §§ 8, 9, 10, 11, stk. 3, og 58 udgår.
5. Alle § nr. 11 og højere bliver 3 nr. lavere.
6. I alle henvisninger til paragraf nr. 11 og højere bliver § nr. 3 nr. lavere.

Viðmerkingar:

Í 1978 setti landsstýrið eina ráðleggingarnevnd fyri apoteksverkið. Tær galdandi reglurnar fyri nevndina eru samtyktar á landsstýrisfundi 30. juni 1983.

Limirnir í ráðleggingarnevndini eru landsapotekarin, apotekararnir á apotekinum og ein útnevndur av landsstýrinum.

Ein av uppgávunum hjá nevndini er at kanna galdandi lóggávu apoteksverkinum viðvíkjandi, og hevur nevndin seinastu 4 árini arbeitt við hesi uppgávu. Nevndin hevur í mars mánaði 1987 sent landsstýrinum: Uppskot, álit og viðmerkingar, løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág.

Landsstýrið tekur undir við uppskoti nevndarinnar til løgtingslóg, tó við tí broyting, at tað ikki í hesi lóg eigur at standa, at landsapotekarin og apotekararnir eru tænastumenn. Setanarstøðið hjá teimum eigur ikki at vera ein partur í

apotekslóggávuni, men hoyrir náttúrliga til í løgtingslógini um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumannastørvum. Skulu størvini vera tænastumannastørv, má hetta gerast við broyting ella uppískoyti til tænastumannalógina. Spurningurin verður tikin til viðgerðar, tá løgtingið hevur tikið støðu til uppskotið um apotekslógina. Broytingaruppskot landsstýrisins hava sína orsøk í hesi støðutakan.

Landsstýrið vísir annars til viðmerkingarnar frá ráðleggingarnevndini.

Sí skjal 17

1. viðgerð 6. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum hin 31. mars 1987 og aftan á 1. viðgerð hin 6. apríl 1987 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin er av teirri áskoðan, at tað ikki er gjørligt at viðgera hetta mál til lítar, nú tingið skal til hús, og setir tí ein sunnd almanna- og heilsunevnd soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Almanna- og heilsunevndin verður gjørd til millumtinganevnd til tess at viðgera løgtingsmál nr. 119/1986: Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág.

2. viðgerð 10. apríl. Uppskotið til samtyktar frá almanna- og heilsunevndini samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 918-3-1

120 Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving

Ár 1987, týsdagin 31. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984 um sjómansútbúgving sum broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 9. januar 1986 verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, 2. punktum verður broytt til § 2, 3. stk.
2. Í § 2 verður aftan á pkt. 6 sum nýtt 2. stk. sett: »Á sjóvinnuskúla fer fram fyririking til dugnaskapsprógv og yrkisútbúgvingarprógv innan sjóvinnu.«
3. Í § 3 verður sum nýtt 3. stk. sett:
»Sjóvinnuskúlaútbúgvingin umfatar heilt ella partvist hesar læru greinir:
samfelagskunning og landafrøði,
føroyskt,
enskt,
støddfrøði,
alis- og evnafrøði,
sjómansskapur, ástøðiliga og handliga,
teknifrøði,
trygd á sjónum,
eldsløkking,
motor- og amboðsfrøði,

lagtingslov om ændring af lagtingslov om sømandsuddannelse.

§ 1.

I lagtingslov nr. 65 af 5. juni 1984 om søfartsuddannelse som ændret ved lagtingslov nr. 2 af 9. januar 1986 foretages følgende ændringer:

1. § 2, 2. punktum ændres til § 2, stk. 3.
2. I § 2 indsættes efter pkt. 6 som nyt stk. 2: »På søfartsskole forberedes til dueligheds bevis og erhvervsuddannelsesbevis inden for søfart.«
3. I § 3 indsættes som nyt stk. 3:
»Søfartsskoleuddannelsen omfatter helt eller delvis følgende fag:
samfundskundskab og geografi,
færøsk,
engelsk,
matematik,
fysik og kemi,
sømandsskab, teori og praktik,
tegningslæsning,
sikkerhed til søs,
brandbekæmpelse,
motor- og værktøjslære,
vedligeholdelse og rengøring,
navigation,

viðlíkahald og reingerð,
siglingarfrøði,
sjóreglur,
samskifti (signalering),
kokkahústænasta, fødievnisfrøði og vørukunning o.a.,
heilsufrøði (fyrsta hjálp),
fiskivinna.
Um gongdin ger tað neyðugt, kann landsstýrið áseta, at undirvísing eisini skal fevna um aðrar lærugreinir, ella at onkrar falla burtur.«

4. Í § 7 verður aftan á »sjómansskúla« skoytt uppí: »og sjóvinnuskúla«.
5. Í § 9 verður aftan á »sjómansskúlarnir« skoytt uppí: »og sjóvinnuskúlarnir.«

søvejsregler,
signalering,
kabystjeneste, proviantlære og varekundskab m.m.,
sundhedslære (førstehjælp),
fiskerierhverv.
Såfremt udviklingen nødvendiggør det, kan landsstyret bestemme, at undervisningen også skal omfatte andre fag, eller at nogle bortfalder.«

4. I § 7 tilføjes efter »sømandsskole«: »og søfartsskole«.
5. I § 9 indsættes efter »sømandsskolerne«: »og søfartsskolerne«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í álitinum um navigatørútbúgving frá mars 1985 varð dentur lagdur á, at neyðugt var at seta sjóvinnuskúla á stovn, og tey uppskotini, sum vóru sett fram í hesum áliti, vóru grundað á, at sjóvinnuskúli fór at verða settur á stovn, og at undirvísingin har fór at verða skipað við grundskeiði og ymiskum yrkisskeiðum.

Tann 26. august 1985 setti landsskúlastjórin eina nevnd at gera uppskot um sjóvinnuskúla, og 9. desember 1986 handaði nevndin Landsskúlafyrisitingini álit sítt viðvíkjandi sjóvinnuskúla í Føroyum, sí hjálagda skjal.

Á fundum 16. desember 1986 og 3. februar 1987 hevur landsskúlaráðið viðgjørt hetta álitið og samtykt at mæla landsstýrinum til at leggja fyri tingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving, soleiðis at henda løgtingslóg umframt at fevna um útbúgving á sjómansskúla fer at fevna um útbúgving á sjóvinnuskúla.

Landsstýrið vísir til hjálagda álit viðvíkjandi bygnaðinum á sjóvinnuskúla, innihaldi í frálæruni, tímabýti, hølistørvi o.ø.

Sí skjal 18

1. viðgerð 3. apríl. Málið varð beint í mentanar- og skúlanevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. mars 1987 og varð eftir fyrstu viðgerð beint í mentanar- og skúlanevndina.

Talan er um uppskot til broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving (løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984), og endamálið við broytingini er, at seta á stovn sjómansskúla, har fyrireiking til dugnaskapsprógv og yrkisútbúgving innan sjóvinnuna kunnu verða veittar.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur nevndin undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Landsskúlafyrisitingina. Hetta umboð hevur greitt nevndini nærri frá tí fakliga nevndararbeiði, ið liggur til grund fyri lógaruppskotinum. Vist verður í hesum sambandi til álit viðvíkjandi sjóvinnuskúla í Føroyum, dagfest 9. september 1986.

Nevndin skal vísa á, at uppskotið er ein náttúrlig fortreyt fyri, at broytingin í navigatørútbúgvingini frá mars 1985 kann virka sum ætlað.

Nevndin skal eisini loyva sær at vísa til, at grundskeið nú er krav samb. STCW-sáttmálanum til teir, sum skulu mynstra við farmaskipum. Fakliga nevndin, sum hevur arbeitt við málinum, hevur eisini mælt til, at grundskeið í framtíðini verður eitt tilboð til teirra, sum skulu mynstra við fiskiskipum.

Annars miðar uppskotið ímóti, at øll, sum ætla sær í lívsstarv á sjónum, skulu luttaka í grundskeiði, men uppskotið gevur samstundis møguleikar fyri frávikum, ið skulu verða umsitin av einum komandi sjóvinnuráði. Sjálv frálæran er býtt í grundskeið og yrkisskeið. Grundskeið uppá 26 vikur verður við tíðini eitt krav til øll tey, ið sum nevnt ætla sær lívsstarv á sjónum. Yrkisskeið má metast sum eitt tilboð til tey, sum ætla sær undir eitt nú skipsføraraútbúgving.

Nevndin hevur eisini viðgjørt ta reglugerð, sum liggur við uppskotinum, og heldur nevndin, at reglurnar eru í so harðliga orðaður. Nevndin mælir tí til, at reglugerðin verður endurskoðað, soleiðis at innihaldið verður meira nútíðarhóskandi.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

2. viðgerð 9. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 27-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 27-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. apríl. Málið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1629-1-3. Lóg nr. 64 frá 21. mai 1987

121 Ókeypis koppseting ímóti barnasjúkum

Ár 1987, mikudagin 8. apríl legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at seta í gildi hjálagda uppskot til kgl. fyriskipan um broyting av fyriskipan um gildiskomu í Føroyum av lóg um ókeypis koppseting fyri ávísum sjúkum.

Viðmerkingar:
Ríkisumboðið hevur í skrivi 13. februar 1987 sent løgtinginum til ummælis eitt uppskot til broyting av kgl. fyriskipan um gildiskomu í Føroyum av lóg um tilboð um ókeypis koppseting fyri ávísum sjúkum, soleiðis at sett verður nýggj § 1, stk. 3, um, at landsstýrið ber útreiðslurnar við koppseting ímóti meslingum, fárasjúku og reydlingum.

Eisini hevur ríkisumboðið í sama skrivi sent landsstýrinum til ummælis eitt uppskot til kunning um ókeypis koppseting fyri ávísum sjúkum, og hevur landsstýrið á fundum 27. februar 1987 og 12. mars 1987 mælt til, at hesar kunningar verða settar í gildi í Føroyum.

Landsstýrið skal fyri sín part mæla tinginum til at ráða ríkisstýrinum til at seta í gildi í Føroyum umroddu broyting av lógini um ókeypis koppseting fyri ávísum sjúkum.

Sí skjølini 19 A-E

1. viðgerð 9. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. apríl 1987 við viðmæli um at seta í gildi fyriskipan um broyting av fyriskipan um ókeypis koppseting móti ávísum sjúkum.

Aftan á 1. viðgerð hin 9. apríl 1987 varð málið beint í almanna- og heilsunevndina, ið hevur viðgjørt málið og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið

2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 927-10

122 Skattligur stuðul til sjálvfíggjan av útbúgving

Ár 1987, týsdagin 31. mars legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at hækka skattafría inntøkuhámarkið hjá føroyingum í útbúgving uttanlands.

Viðmerkingar:

Uppskotið miðar ímóti at bøta møguleikarnar hjá føroyskum ungdómi í útbúgving uttanlands at sjálvfíggja læruna við loyvi at vinna meiri inntøku í fritíðini, sum teim ikki tørvar at rinda skatt av.

Eitt lógaruppskot í tráð við hetta uppskot kann verða avmarkað til ta broyting í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1984 um landsskatt og kommunuskatt, § 33, nr. 11, har verandi mestaupphædd 15.000 kr. verður hækkað upp í t.d. 25 ella 30.000 fyri árið.

Uppskotið er bert ætlað at veita føroyingum, og ikki útlendingum, í fritíðararbeiði í Føroyum bøttar skattafríar inntøkumøguleikar. Útlendingar eiga at rinda skatt av allari inntøkuni.

Tá nýggja skattainnkrevjingin fór at virka, vístu fleiri feløg hjá føroyingum í útbúgving á, at tann møguleiki, tey fyrr høvdu til at sjálvfíggja part av útbúgvingini við t.d. útsettum skatti, nú fall burtur.

Víðari verður mælt til — og eisini tikið undir við frá politiskari síðu, at henda nú skattlagda inntøka skuldi verða samsýnt á annan hátt frá almennari síðu.

Undanfarna samgongu hækkaði trífalt stuðulin á fíggjarlógini til alla hægri útbúgving til tess at bøta um lestrarstuðuls- og lestrarlánsorku landskassans til ungar føroyingar.

Henda samgongan, sum tá vendi sog illa saman við feløgum teirra lesandi um versnaðu fíggjanarmøguleikarnar undir fyrra landsstýri, hækkaði bert fíggjarlógaruppheddina til hægri lestur við 50% og hevur ikki enn broytt skattleggingina av lestrarungdómi.

Eitt uppskot frá Fólkaflokinum nú í vetrartingsetuni um at loyva øllum fólki, ið skulu undir læru, eina skattafría inntøku frammanundan, varð felt av hesi samgongu.

Hetta uppskot hevði bøtt møguleikarnar hjá føroyingum at forvinna skattafrítt ein størri part av ti, ið ein og hvør lærutíð kostar. Tað er hevði hugaligari og persónliga meiri monnandi at sjálvfíggja sum mest av egnum lærutreiðsfum.

Sambært upplýsingum frá Líkningarráðnum vóru knapt 600 føroyingar skrásettir sum lesandi ella undir útbigving annars uttanlands í 1984, hvørv eini 20% høvdu inntøku undir 15.000 kr., sum er verandi frikortsupphæddi.

Stívliga 300 persónar høvdu inntøkur millum 15.000 og 30.000 kr., og 70 persónar vóru skrásettir við inntøku oman fyri tær 30.000 kr.

Verður skattafría inntøkumarkið hækkað t.d. til 30.000 kr. sum í hesum uppskoti, fær tann lesandi, ið er farin fyri at forvinna hesa upphæddi, ein øvrka skattalætta í samlaðum landsskatti upp á einar 4.000 kr. (umframt kommunu skatt).

Út frá frammanfyri nevndu tølum kann samlaða inntøkutapið hjá tí almenna metast til einar 2 milj. kr. alt, hvørav landskassans partur er um 1,2 milj. kr. (kommunanna 800.000 kr.).

Skattanevndin hjá løgtinginum — og landsstýrið, um uppskotið verður samtykt — eiga at finna útvegir fyri at broyta skattaskrásetingina soleiðis, at uppskotið bert umfatar føroyingar í fritíðarvinnu í Føroyum og ikki útlendingar.

Skattanevndin eigur eisini at kanna, í hvønn mun hetta frikortsupphæddin bert skal galda fyri landsskattin, av tí at tað neyvan er rætt uttan víðari at áleggja kommunum í Føroyum ein inntøkumiss, hóast hann bert er nakrar fáar hundrað túsund tilsamans.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 31. mars 1987 og undir fyrstu viðgerð tann 7. apríl 1987 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Hilmar Kass og Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskotinum um, at skattafría inntøkumarkið hjá persónum í útbúgving uttanlands verður hækkað við teirri grundgeving, at hesir hava kostnað av at koma til Føroya at vinna peningin.

Meirilutin mælir tó til, at hámarkið í hesum føri verður hækkað til kr. 20.000,-.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum og teirri hækking, sum er nevnd í viðmerkingunum. Í øðrum lagi tekur minnilutin undir við uppskoti meirilutans.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur undir við uppskotinum um at hækka hámarkið, men tá hækkingin krevur lógarbroyting, og minnilutin ynskir, at

broytingin kemur at virka fyri tey, sum hvørt summar koma til Føroya at fortvinna sær pening til útbúgving, setir nimniluttin fram fylgjandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður »15.000 kr.« í § 33, nr. 11 broytt til »25.000 kr.«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat ændres »15.000 kr.« i § 33, nr. 11 til »25.000 kr.«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 13. apríl 1987. Við 18-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið aftur í skattanevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit II

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 31. mars 1987 og undir fyrstu viðgerð tann 7. apríl 1987 beint í skattanevndina.

Undir 2. viðgerð tann 13. apríl varð málið beint aftur í skattanevndina, sum hevur viðgjørt málið av nýggjum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluttar.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Hilmar Kass og Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskotinum um, at skattafría inntøkumarkið hjá persónum í útbúgving uttanlands verður hækkað við teirri grundgeving, at hesir hava kostnað av at koma til Føroya at vinna peningin.

Meirilutin mælir tó til, at hámarkið í hesum føri verður hækkað til kr. 20.000,-, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður »15.000 kr.« í § 33, nr. 11 broytt til »20.000 kr.«.

§ *2.*

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat ændres »15.000 kr.« i § 33, nr. 11 til »20.000 kr.«.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum og teirri hækking, sum er nevnd í viðmerkingunum. Í øðrum lagi tekur minnilutin undir við uppskoti meirilutans.

Minnilutin (Agnar Nielsen) førir fram: Føroyingar hava í høvuðsheitum tað búsetingarmynstur, at hvør familja hevur síni egnu sethús at búgva í.

Og tað hevur áður verið soleiðis, at dreingir og ungir menn frá tí fyrsta, teir byrjaðu at forvinna sær nakrar krónur, ofta á umleið 14 ára aldri, settu peningin inn í sparikassa ella banka fyri at spara saman til at byggja sær hús fyri, tá teir seinri skuldu setast í búgv og seta fót undir egið borð, meðan genturnar og tey ungu konufólkini løgdu stóra orku í at vinna sær útstýr, til tær skuldu blíva húsmøður.

Tá varð gerð av sethúsum í stóran mun gjørt sum ókeypis arbeiði, grundstykkini kostaðu lítið, og stundum vóru tey ókeypis, so at tey, sum giftust og settust í búgv, høvdu nakað at grunda sítt heim á.

Nú eru tíðirnar so ógvuliga nógv broyttar, nú ganga bæði konufólk og mannfólk í læru og skúla, ofta til tey eru eini 20-30 ára gomul. Hesari nógv økta útbúgvingini hava bæði tey einstøku fólkini og samfelagið sum heild brúk fyri. Í hesi læru- og skúlatíð hava tey lítlar møguleikar at vinna sær nakran pening av týdningi, og mong eru tey, sum eftir lokna útbúgvingartíð sita við eini lestrar skuld, samstundis sum tey eru komin í giftingarføran aldur og skulu setast í búgv.

Tað er eyðvitað, at tað fíggjarliga støðið hjá meginpartinum av teimum ungu í dag ikki kann vera gott, tá tey bæði skulu útbúgva seg til eitt yrki og setast í búgv samstundis, og tí kunnu tey koma út í stórar fíggjarligar trupulleikar, sum eisini kunnu føra til aðrar avleiðingar í tí ríkasta og mest umráðandi partinum av lívsskeiðinum.

Og tí heldur minnilutin tað vera rímiligt og rætt, at tað almenna rættir eina hond til tey ungu í útbúgving við at hækka tað skattafría inntøkumarkið frá 15.000,- til 25.000,- kr., og setir minnilutin fram fylgjandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður »15.000 kr.« í § 33, nr. 11 broytt til »25.000 kr.«.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat ændres »15.000 kr.« i § 33, nr. 11 til »25.000 kr.«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Framhaldandi 2. viðgerð 13. apríl. Uppskot minnilutans í áliti II fall við 11-0 og burturdottið. Uppskot meirihlutans § 1 samtykt við 28-0 atkvøðum. § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Við 28-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð. Uppskot uppskotsstillarans til samtyktar fall við 10-0 atkvøðum.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 41 frá 5. mai 1987

123 Broyting í skattalógum

Ár 1987, fríggjadagin 3. apríl legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg
um
broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 21, 2. stk. verður landsstýrið broytt til: likningarráðið.
2. Í § 24. 2. stk. verður § 1, 1. stk. nr. 8-14 broytt til: § 1, 1. stk. nr. 8-15.
3. § 25, nr. 3) verður orðað soljóðandi:
   renta ella vinningur av skuldarbrøvum, partabrøvum og øðrum virðisbrøvum, av útistandandi fíggjarkrøvum og av útlæntum peningi, tó ikki renta av peningi innistandandi í føroyskum peningastovni ella postgiro sambært løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 og vinningsbýti frá partafeløgum v.m. skrásett í Føroyum sambært § 1, nr. 8.
4. Í § 26, 3. stk. verður síðsta punktum orðað soljóðandi:
   Líkningarráðið ásetir nærri regl ur fyri uppgerðina.
5. § 29, nr. 1) verður orðað soljóðandi:
   vinningur av sølu av ognum hjá hinum skattskyldugu í tann mun,

Lagtingslov
om
ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 21, stk. 2, ændres landsstyret til: ligningsrådet.
2. I § 24, stk. 2, ændres § 1, stk. 1 nr. 8-14 til: § 1 stk. 1 nr. 8-15.
3. § 25, nr. 3) affattes således:
   rente eller udbytte af obligationer, aktier og andre værdipapirer, af udestående fordringer og af udlånt kapital, dog ikke rente af indestående i færøsk pengeinstitut eller postgiro, jfr. lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953, samt udbytte fra på Færøerne registrerede aktieselskaber m.v., jfr. § 1, nr. 8.
4. I § 26, stk. 3 affattes sidste punktum således:
   Ligningsrådet fastsætter nærmere regler for opgørelsen.
5. § 29, nr. 1) affattes således:
   fortjeneste ved realisation af den skattepligtiges ejendele i den udstrækning den ikke ifølge andre bestemmelser i skattelovgivnin-

hann ikki sambært aðrar reglur í skattalóggávuni skal teljast við í skattskyldugu inntøkuna.

6. § 31, 1. stk., litra e) verður orðað soljóðandi:
   árlig avskriving skipað við serligari lóg.
7. Sum nýggj § 31, 2. stk. verður sett:
   Um ein persónur, sum er skattskyldugur sambært § 1, hevur gjørt skattligar avskrivingar ella avsetingar í íløgugrunn, og skattskylduga inntøkan er lægri enn skattliga uppgerðin av eginnýtsluni smbrt. 3. stk., verður skattskylduga inntøkan sett ájavnt skattligu uppgerðina av eginnýtsluni. Hækkingin av skattskyldugu inntøkuni skal tó ongantíð fara upp um samlaðu avskrivingarnar og avsetingina í íløgugrunn.
8. Sum nýggj § 31, 3. stk. verður sett:
   Landsstýrið ásetur nærri reglur um, hvussu eginnýtslan skal gerast upp.
9. Sum nýggj § 31, 4. stk. verður sett:
   Skattligu avskrivingarnar í 2. stk. fevna ikki um avskrivingar, sum eru bundnar til tað ávisa árið, og sum verða mistar, um tær ikki verða gjørdar í tí árinum.
10. Sum nýggj § 31, 5. stk. verður sett:
    Skattskyldugur persónur, hvørs inntøka er hækkað sambært reglunum í 2. stk., missir tó ikki hesar avskrivingar v.m., tí hesar verða mettar sum ikki gjørdar tað árið, inntøkan verður hækkað.
11. Sum nýggj § 31, 6. stk. verður sett:
    Tá skattliga eginnýtslan hjá hjúnum, sum eru samskattað við enda inntøkuársins, verður gjørd upp,

gen skal modregnes i den skattepligtige indkomst.

6. § 31, 1 stk. litra e) affattes således:
   årlig afskrivning i henhold til særlig lov.
7. Som ny § 31, stk. 2 indsættes:
   Hvis en person, der er skattepligtig efter § 1, har foretaget skattemæssige afskrivninger eller henlæggelser til investeringsfond, og den skattepligtige indkomst er mindre end det skattemæssigt opgjorte privatforbrug, ansættes den skattepligtige indkomst lig med det skattemæssige opgjorte privatforbrug. Forhøjelsen af den skattepligtige indkomst skal dog ikke kunne overstige de samlede afskrivninger og henlæggelser.
8. Som ny § 31, stk. 3 indsættes:
   Landsstyret fastsætter de nærmere regler for opgørelsen af privatforbruget.
9. Som ny § 31, stk. 4 indsættes:
   De skattemæssige afskrivninger i stk. 2 omfatter ikke afskrivninger, der er bundet til det enkelte år og som fortabes, hvis de ikke foretages i det pågældende år.
10. Som ny § 31, stk. 5 indsættes:
    En skattepligtig person, hvis indkomst er forhøjet efter reglerne i stk. 2, fortaber ikke derved de pågældende afskrivninger m.m., idet disse betragtes som ikke foretaget det år, indkomsten forhøjes.
11. Som ny § 31, stk. 6 indsættes:
    Ved opgørelsen af det skattemæssige privatforbrug for ægtefæller, der er sambeskattede ved indkomstårets udløb, indgår ægtefællernes indkomst for hele indkomst-

verður inntøkan hjá hjúnunum fyri alt inntøkuárið og ogn og skuld við árs byrjan og enda tikin við.

12. § 33, nr. 4) verður orðað soljóðandi:
útreiðslur til ferðing, umboðan, lýsingar o.t., sum í sambandi við vinnuvirki standast av at selja vøru og tænastur í inntøku árinum og seinni inntøkuár. Landsstýrið hevur heimild til at áseta nærri reglur viðvíkjandi krøvum til skjalprógv og útgreinan av nevndu útreiðslum og kann áseta loyvdar upphæddir til vistarhald.

13. § 33, nr. 7) verður orðað soljóðandi:
hjá persóni, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart og fólka-, avlamis-, einkju og aðra pensjón, ein løntakarafrádrátt, sum er 2.000 kr., um inntøkan er undir 10.000 kr., tó í mesta lagi ájavnt við inntøkuna. Er inntøkan 10.000 kr. ella hægri, er frádrátturin 20% av inntøkuni, tó fyri álmanakkaárið 1987 hægst 8.400 kr. Hava bæði maður og kona inntøku, eiga bæði rætt til frádráttin. Løntakarafrádrátturin verður prístalsviðgjørdur 1. juli 1987 við prístalinum pr. 1. januar 1984 sett til 100. Broytingin í løntakarafrádráttinum verður útroknað hvønn 1. juli og kunngjørd av Likningarráð Føroya sum galdandi fyri komandi álmanakkaárið.

14. Sum nýggj § 33, nr. 12) verður sett:
tap uppá skuldarar, heruppií útláns- og ábyrgdarskuldarar hjá peningastovnum, tá ið vissa er

aret og deres formue ved årets begyndelse og slutning.

12. § 33, nr. 4) affattes således:
udgifter til rejser, repræsentation, reklame o.l. i forbindelse med erhvervsvirksomhed med det formål at opnå salg af varer og tjenester i det pågældende og senere indkomstår. Landsstyret har hjemmel til at fastsætte nærmere regler vedrørende krav til dokumentation og specifikation af nævnte udgifter og kan fastsætte et loft for beløb, der anvendes til kost og logi.

13. § 33, nr. 7) affattes således:
hos personlige skattepligtige, som oppebærer lønindtægt, herunder indtægt ved partsfiskeri- og fælke-, invalide, enke- og anden pension et lønmodtagerfradrag, som er kr. 2.000,-, hvis indtægten er under kr. 10.000,-. Fradraget kan dog ikke overstige indtægten. Er indtægten kr. 10.000,- eller mere, kan fradrages 20% af indtægtsbeløbet, dog højst kr. 8.400,- for kalenderåret 1987. Har begge ægtefællerne indtægt, er begge berettiget til fradraget. Lønmodtagerfradraget bliver pristalsreguleret 1. juli 1987 med pristallet pr. 1. januar 1984 sat til 100. Ændringer i lønmodtagerfradraget udregnes hver den 1. juli og offentliggøres af Likningsrådet Føroya som gældende for det efterfølgende kalenderår.

14. Som ny § 33, nr. 12) indsættes:
tab på debitorer, herunder pengeinstitutters udlæns og kautionsdebitorer, når tabet er konstateret.

fingin fyri, at peningurin er mistur. Likoingarráðið ásetur nærri reglur um, nær tapið kann dragast frá.

15. Í § 46, 2. stk. verður 5. punktum strikað, og 4. punktum verður orð að soljóðandi

Um so er, at samanlagdi kommunuskatturin hjá hjúnafelagunum, afturat at 14% av samanlagdu rentuupphæddi teirra er drigin frá, tá vísir hall, kann hetta verða drigið frá í kommunuskattinum í tey næstu árini og soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um kommunuskattur er til tess, og annars so nógv, sum kommunuskattur er til.

16. Í § 48, 2. stk. verður (smb. § 1, nr. 7-14) broytt til: (smb. § 1, nr. 7-15).

17. § 75, 2. stk. verður orðað soljóðandi:
Endurgjald eftir § 79, 3. stk. verður ikki góðskrivað í skatti, sum verður afturgoldin eftir 1. stk.

18. § 77, 1. stk. litra b) verður orðað soljóðandi:
A-skattur, sum skattavoldið hevur álagt í skattskylduga at gjalda samb. § 130.

19. § 79, 4. stk. verður orðað soljóðandi:
Afturgjalding av avlopsskatti við endurgjaldi eftir 3. stk. fer fram áðrenn 1. desember í álikningarárinum. Um afturgjaldingin er aftan á 1. desember, verður renta roknað fyri hvønn byrjaðan mánað frá 1. desember við 1%. Áðrenn afturgjalding verður framd, verður møgulig eftirstøða av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum mótroknað.

Ligningsstridet fastsætter nærmere regler om, hvornår tabet kan fradrages.

15. I § 46, stk. 2 udgår 5. punktum, og 4. punktum affattes således:
Hvis ægtefællernes samlede kommuneskat bliver negativ efter fradrag af 14% af deres samlede renteudgifter, kan det negative beløb fradrages i kommuneskatten for de nærmest efterfølgende 3 indkomstår, således at hele underskuddet fradrages det første år, såfremt det kan dækkes af kommuneskatten dette år, og ellers så stor en del, der er dækning for.

16. I § 48, 2. stk. ændres (jfr. § 1, nr. 7-14) til: (jfr. § 1, nr. 7-15).

17. § 75, 2. stk. affattes således:
Der ydes ikke godtgørelse efter § 79, stk. 3 ved tilbagebetaling af skat efter stk. 1.

18. § 77, stk. 1, litra b) affattes således:
A-skat, som skattemyndighederne har pålagt den skattepligtige at betale i medfør af § 130.

19. § 79, stk. 4, affattes således:
Tilbagebetalingen af overskydende skat med godtgørelse efter stk. 3 sker før 1. december i ligningsåret. Hvis tilbagebetalingen sker efter 1. december, tilkommer der den skattepligtige en rente på 1% pr. påbegyndt måned fra 1. december at regne. Forinden tilbagebetalingen modregnes eventuelle restancer af personlig skat med påløbne morarenter.

20. I § 81, stk. 1, ændres § 1, nr. 7-14 til: § 1, nr. 7-15.

20. Í § 81, 1. stk. verður: § 1, nr. 7-14 broytt til: § 1, nr. 7-15.
21. Í § 81, 2. stk. verður: § 143, 1. stk. broytt til: § 146, 1. stk.
22. § 94, 2. stk. verður strikað.
23. Sum nýggj § 99, 5. stk. verður sett: Úrskurður landsskattanevndarinnar skal skjótast inn fyri Føroya Rætt, innan 6 mánaðir eru farnir.
24. § 100, 3. stk. verður orðað soljóðandi:
    Sjálvuppgávan av inntøkuni skal vera innlatin til líkningarráðið í seinasta lagi 15. mars. Sjálvuppgávur frá deyðsbúgvum, feløgum, felagsskapum v.m. smbr. § 1, 1. stk. nr. 7 15 skulu vera innlatnar í seinasta lagi 1. juni. Sjálvuppgávan er roknað fyri at vera innlatin rættstundis, tá ið hon í seinasta lagi nevnda dag er fingin líkningarráðnum ella latin í postin.
25. § 103, 3. stk., 2. punktum verður orðað soljóðandi:
    Kommunala likningarvaldið hevur umframt heimild til at seta freist, nær ið roknskapurin og sjálvuppgávan skal verða innsend, og leggja við 100 kr. í dagsekt frá tí degi, at freistin er úti, og til tilfarið kemur inn.
26. § 105, 2. stk. verður orðað soljóðandi:
    Kommunala likningarvaldinum/líkningarráðnum er heimilað, tá ið serligar grundir eru til tess, at leingja freistina, sum sambært 1. stk. er sett av líkningarráðnum.
27. Í § 106 verða orðini: sambært § 139 strikað.

21. I § 81, stk. 2, ændres § 143, stk. 1 til: § 146, stk. 1.
22. § 94, stk. 2 udgår.
23. Som ny § 99, stk. 5 indsættes:
    Landsskatteudvalgets afgørelse kan indbringes for Færøya Ret inden 6 måneder.
24. § 100. stk. 3 affattes således:
    Selvangivelsen af indkomsten skal være indgivet til ligningsrådet senest den 15. marts. Selvangivelser fra dødsboer, selskaber, foreninger m.v. jfr. § 1, nr. 7 15 skal være indgivet senest 1. juni. Selvangivelsen betragtes som indgivet rettidig, når den senest den nævnte dag er afleveret til ligningsrådet eller afgivet til postbesørgelse.
25. § 103, stk. 3, 2. punktum affattes således:
    Den kommunale ligningsmyndighed kan fastsætte en frist, inden hvilken regnskabet og selvangivelsen skal være indsendt, og pålægge den pågældende, såfremt fristen overskrides, da at svare en daglig bøde af kr. 100 regnet fra fristens udløb og indtil materialet indsendes, ligesom også ligningsrådet til enhver tid kan fremtvinge indsendelse ved pålæg af en daglig bøde.
26. § 105, stk. 2, affattes således:
    Den kommunale ligningsmyndighed/ligningsrådet er bemyndiget til, når særlige begrundelser herfor foreligger, at forlænge de frister, som ifølge stk. 1 er sat af ligningsrådet.
27. I § 106 udgår ordene: i medfør af § 139.

28. Skoytt verður uppí § 119, 1. stk. soljóðandi;
Sýtir skattgjaldari at lata líkningarmyndugleikunum roknskapartilfar v.m., kann líkningarráðið áleggja dagliga sekt, til tilfarið er útflýggjað.

29. § 119, 3. stk. verður orðað soljóðandi:
Eisini hevur líkningarráðið ella tann persónur, ið líkningarráðið tilnevnir, rætt til at koma á staðið at gera upp og meta um vørugeymsluna, innistøðu, innbúgv, maskinur og onnur amboð.

30. Sum nýggj § 119, 4. stk. verður sett:
Persónur ella felag v.m., sum forðar líkningarráðnum ella tilnevndum persóni at koma á staðið sambært 3. stk., kann revsast við sekt.

31. Sum nýggj § 119, 5. stk. verður sett:
Líkningarráðið kann um neyðugt biðja løgregluna hjálpa sær í teimum førum, sum nevnd eru í 1.-3. stk.

32. Sum nýggj § 120 a verður sett:
Bankar, sparikassar, vekslarar, advokatar o.o., ið taka ímóti peningi og øðrum virðum at umsita, ella sum reka vinnu við at læna út pening, skulu eftir áheitan lata líkningarmyndugleikunum ella tí persóni, sum líkningarmyndugleikin hevur tilnevnt, allar upplýsingar um innistandandi pening, lán, goymslur ella boks hjá navngivnum persónum, tá ið tað er av týdningi fyri skattaálíkningina, at hesar upplýsingar kunnu verða útvegaðar. Soleiðis kann verða

28. Til § 119, stk. 1 tilføjes følgende:
Nægter en skatteyder at give ligningsrådet regnskabsmateriale m.v., kan ligningsrådet pålægge den pågældende daglig bøde, indtil materialet foreligger.

29. § 119, stk. 3, affattes således:
Ligningsrådet eller den person, som dette bemyndiger dertil, er også berettiget til at få adgang til på stedet at foretage opgørelse og vurdering af lagerbeholdning, besætning, inventar, maskiner og andet driftsmateriale.

30. Som ny § 119, stk. 4, indsættes:
Personer eller selskaber m.v., som forhindrer ligningsrådet eller person, som dette har bemyndiget dertil, adgang til at komme på stedet ifølge stk. 3, straffes med bøde.

31. Som ny § 119, stk. 5 indsættes:
Ligningsrådet kan om nødvendigt bede politiet om bistand i de i stk. 1-3 nævnte tilfælde.

32. Som ny § 120 a indsættes:
Er útveganarpeningurin hægri enn 150.000 kr., verður tann upphæddin, sum avskrivingin kann roknast av, lækkað við ti upphædd, sum útveganarpeningurin fer upp um 150.000 kr. Henda upphædd verður skrásett sum ein serstakur aktivpostur í ti roknskapi, sum skal fylgja við sjálvuppgávuni, og kann ikki verða avskrivaður sambært hesi lóg.

6. Í § 7, 3. stk. verður skoytt uppí soljóðandi:
Tó kann ikki verða avskrivað av útreiðslum til ábøtur uppá rakstrargøgn, sum upprunaliga eru útvegað fyri meira enn 150.000 kr. Slíkar útreiðslur til ábøtur verða skrásettar á tann í 2. stk. umrødda aktivpost í roknskapinum.

7. § 8, 2. stk. verður orðað soljóðandi:
Er sølupeningurin minni enn útveganarpeningurin, tá ið allar roknaðar avskrivingar eru frádrignar, kann partur av munirnum verða drigin frá í skattskyldugu inntøku søluársins. Munurin verður tó lækkaður við ti restupphædd, sum sambært § 8, 2. stk. ikki kann

værdi i handel og vanden, den dag omdringen sker, overstiger kr. 150.000.

Stk. 6. Bestemmelserne i kap. 1 anvendes iøvrigt på de i stk. 1 omhandlede personbiler i det omfang, de er forenelige med bestemmelserne i stk. 1-4.

5. I § 7, stk. 2, tilføjes:
Overstiger anskaffelsessummen kr. 150.000, nedsættes det beløb, hvoraf afskrivningen kan beregnes, med det beløb, som anskaffelsessummen overstiger kr. 150.000. Dette beløb registreres som en særlig aktivpost i det regnskab, som skal følge med selvangivelsen, og kan ikke gøres til genstand for afskrivninger i henhold til denne lov.

6. I § 7, stk. 3, tilføjes:
Der kan dog ikke afskrives på forbedringsudgifter vedrørende driftsmidler, hvis oprindelige anskaffelsessum har oversteget kr. 150.000. Sådanne forbedringsudgifter registreres på den i stk. 2 omtalte aktivpost i regnskabet.

7. § 8, stk. 2 affattes således:
Hvis salgssummen er mindre end anskaffelsessummen med fradrag af samlede beregnede afskrivninger, kan en del af forskelsbeløbet fradrages i den skattepligtige indkomst for salgsåret. Forskelsbeløbet nedsættes dog med det restbeløb, som i henhold til § 8, stk. 2, ikke kan afskrives. Af det således nedsatte forskelsbeløb kan den del, som svarer til forholdet mellem de skattemæssige afskriv-

avskrivast. Av ti soleiðis lækkaða munninum kann tann partarin, sum svarar til lutfallið millum skattligu avskrivingarnar og allar roknaðar avskrivingar verða drigin frá í skattskyldugu inntøkuni í søluárinum.

8. § 16 c verður orðað soleiðis:
Persónur, hvørs fulla skattskylda í Føroyum heldur uppat, og sum hevur avskrivað av ongum, sum hann eigur uttanlands, skal rinda 40% í avgjaldi av hesum avskrivingum tað árið, full skattskylda í Føroyum heldur uppat.

2. stk. Avgjaldið verður býtt við ⅓ til kommununa og ⅔ til landskassan. Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri umsitingini av hesi reglu.

9. Yvirskriftin til 4. kapittul verður broytt til: Bygningar v.m.

10. Skattlig avskriving eftir reglunum í § 20 kann verða gjørd fyri niðanfyri nevndu bygningar, sum verða nýttir vinnuliga:
a. Bygningar, sum verða nýttir til handverk og iðnað, her íroknað neyðug skrivstovu- og goymsluhøli.
b. Gistingarhús burturav, ella bygningar til útleiging við minst 10 íbúðum, her íroknað neyðug skrivstovu- og goymsluhøli.
c. Aðrir bygningar, herundir skrivstovu- og goymslubygningar, har minst 75% av gólvviddini verða nýtt vinnuliga, her íroknað neyðug goymsluhøli.

11. Sum nýggj § 17, 2. stk. verður sett:
Skattlig avskriving eftir reglunum í § 20, 1. stk. kann verða gjørd fyri niðanfyri nevndu bygningar, sum verða nýttir vinnuliga:
a. Bygningar, sum verða nýttir til handverk og iðnað, her íroknað neyðug skrivstovu- og goymsluhøli.
b. Gistingarhús burturav, ella bygningar til útleiging við minst 10 íbúðum, her íroknað neyðug skrivstovu- og goymsluhøli.
c. Aðrir bygningar, herundir skrivstovu- og goymslubygningar, har minst 75% av gólvviddini verða nýtt vinnuliga, her íroknað neyðug goymsluhøli.

11. Sum nýggj § 17, 2. stk. verður sett:
Skattlig avskriving eftir reglunum í § 20, 1. stk. kann verða gjørd fyri

ninger og de samlede beregnede afskrivninger, fratrækkes i den skattepligtige indkomst for salgsåret.

8. § 16 c affattes således:
Person, hvis fulde skattepligt til Færøerne ophører, og som har afskrevet på aktiver, som han ejer i udlandet, skal i det år, fuld skattepligt til Færøerne ophører, overlægge en afgift på 40% af disse afskrivninger.

2. stk. Afgiften fordeles med ⅓ til kommunen og ⅔ til landskassen. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for administrationen af denne bestemmelse.

9. Overskriften til afsnit IV ændres til: Bygninger m.m.

10. § 17, stk. 1. affattes således:
Skattemæssig afskrivning efter reglerne i § 20 kan foretages på nedenfor anførte bygninger, der benyttes erhvervsmæssigt:
a. bygninger, som anvendes til håndværk og industri, herunder medregnet nødvendige kontor- og lagerlokaler.
b. Bygninger, der udelukkende anvendes til hotel, eller bygninger til udlejning med mindst 10 lejligheder, herunder medregnet nødvendige kontor- og lagerlokaler.
c. Andre bygninger herunder kontor- og lagerbygninger, hvoraf mindst 75% af etagearealet benyttes erhvervsmæssigt, herunder medregnet nødvendige lagerlokaler

11. Som ny § 17, stk. 2 indsættes:
Der kan ikke foretages afskrivning på bygninger, som anvendes til bolig eller dertil knyttede for-

alibrúk (grótkast v.m.) til vinnuliga nýtslu burturav, sum koma ikki undir reglurnar í 1. kapitli í hesi løgtingslóg.

12. Sum nýggj § 17 a verður sett:
Skattlig avskriving eftir reglunum í § 20, 1. stk. kann verða gjørd fyri alibrúk (grótkast v.m.) til vinnuliga nýtslu burturav, sum koma ikki undir reglurnar í 1. kapitli í hesi løgtingslóg.

2. stk. Tær reglur í hesi løgtingslóg, sum eru galdandi fyri bygningar, sum koma undir reglurna í § 17, 1. stk., litra a, eru eisini galdandi fyri tey í 1. stk. nevndu alibrúk.

3. stk. Avskriving sambært 1. stk. er treytað av loyvi líkningarráðsins. Líkningarráðið kann áseta nærri reglur um, undir hvørjum treytum hesar avskrivingar verða loyvdar.

13. Sum nýggj § 20, 4. stk. verður sett:
Verður bygningur um somu tíð nýttur til vinnulig endamál, sum nevnd eru í § 17, 1. stk., litra c og litra a ella litra b, kann skattlig avskriving verða gjørd sambært 1. og 2. stk. í mun til nýtslustigið av gólvviddini í bygninginum.

14. § 25, 1. stk. verður orðað soljóðandi:
Selur ella avhendir hin skattskyldugi bygning ella byggigrund, har bygningur stendur ella hevur staðið, sum kundi verið avskrivaður sambært § 17, 1. stk., litra a, sbr. § 20, fyri meira enn tað skattliga bókaða virðið, so skulu vinningur og gjørdar avskrivingar verða roknað upp í skattskyldugu inntøkuna, um hesi ikki verða nýtt mal, jfr. dog stk. 1.

12. Som ny § 17 a indsættes:
Skattemæssig afskrivning efter reglerne i § 20, stk. 1 kan foretages for anlæg til fiskeopdræt (stenkast m.m.), som udelukkende anvendes erhvervsmæssigt, og som ikke omfattes af reglerne i kapitel 1 i denne lagtingslov.

Stk. 2. De bestemmelser i denne lagtingslov, som er gældende for bygninger, som omfattes af reglerne i § 17, stk. 1, litra a, gælder også for de i stk. 1 anførte anlæg til fiskeopdræt.

Stk. 3. Afskrivning i henhold til stk. 1 er betinget af ligningsrådets tilladelse. Ligningsrådet kan fastsætte nærmere bestemmelser for, under hvilke betingelser afskrivning kan foretages.

13. Som ny § 20, stk. 4, indsættes:
Benyttes en bygning samtidig til erhvervsmæssige formål som anført i § 17, stk. 1, litra c og litra a eller litra b, kan skattemæssig afskrivning foretages efter stk. 1 og stk. 2, forholdsmæssigt svarende til benyttelsesgraden af etagearealet i bygningen.

14. § 25, stk. 1 affattes således:
Sælges eller afhændes den skattepligtige bygning eller byggegrund, hvor der står eller hvorpå der har stået bygning, som kunne være afskrevet efter § 17, stk. 1, litra a, jfr. § 20, for mere end den skattemæssigt bogførte værdi, skal fortjeneste og foretagne afskrivninger medregnes i den skattepligtige indkomst, hvis disse ikke anvendes til anskaffelse af de i

til endurútvegan av teimum í 1. kap. tilskiladu rakstrargøgnum ella teimum í § 17, 1. stk., litra a tilskiladu bygningum í seinasta lagi næsta inntøkuárið aftan á søluárið. Møguligt tap við sølu ella avhending kann ikki verða frádrigið í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni. Fyri bygning og byggigrund, sum er útvegað áðrenn 1. januar 1950, skal vinningur ella tap ikki roknast við í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni, meðan afturvunnar avskrivingar verða viðgjørdar sum tilskilað frammanfyri.

15. § 25, 2. stk. verður orðað soljóðandi:

Selur ella avhendir hin skattskyldugi bygning ella byggigrund, har bygningur, sum kundi verið avskrivaður sambært § 17, 1. stk., litra b og c, sbr. § 20, fyri meira enn tað skattligа bókaða virðið, so skulu vinningur og gjørdar avskrivingar verða roknað upp í skattskyldugu inntøkuna í søluárinum. Møguligt tap við sølu ella avhending kann ikki verða frádrigið í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni. Fyri bygning og byggigrund, sum er útvegað áðrenn 1. januar 1950, skal vinningur ella tap ikki roknast við í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni, meðan afturvunnar avskrivingar verða viðgjørdar sum tilskilað frammanfyri.

16. § 29, 1. stk. verður orðað soljóðandi:

Við sølu av teimum ognarlutum, sum henda lóg viðger, koma í gildi

kap. 1 omhandlede driftsmidler eller de i § 17, stk. 1, litra a omhandlede bygninger senest i indkomståret, der følger efter salgsåret. Eventuelt tab ved salg eller afhændelse kan ikke fradrages i opgørelsen af den skattepligtige indkomst. For bygning og byggegrund, som er erhvervet før den 1. januar 1950, medregnes fortjeneste eller tab ikke i opgørelsen af den skattepligtige indkomst, hvorimod genvundne afskrivninger behandles som angivet foran.

15. § 25, stk. 2 affattes således:

Sælger eller afhænder den skattepligtige bygning eller byggegrund, hvor der står eller hvorpå der har stået bygning, som kunne være afskrevet efter § 17, stk. 1, litra b og c, jfr. § 20, for mere end den skattemæssigt bogførte værdi, skal fortjeneste og foretagne afskrivninger medtages i den skattepligtige indkomst i salgsåret. Eventuelt tab ved salg eller afhændelsen kan ikke fradrages i opgørelsen af den skattepligtige indkomst. For bygning og byggegrund, som er erhvervet før 1. januar 1950, medregnes fortjeneste eller tab ikke i opgørelsen af den skattepligtige indkomst, hvorimod genvundne afskrivninger behandles som angivet foran.

16. § 29, stk. 1 affattes således:

Ved salg af de af denne lov omhandlede formuegoder finder reglerne i § 27 i løgtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat

reglurnar í § 27 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum í førum, har søla av slíkum ognarlutum hoyrir til vinnuveg hjá tí skattskylduga, ella tá hann hevur keypt ognarlutin fyri at selja hann aftur við ágóða.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi beinanvegin.

og kommuneskat med senere ændringer anvendelse i tilfælde, hvor salg af sådanne formuegoder henhører til den skattepligtiges næringsvej, eller det pågældende formuegode er erhvervet i spekulationsøjemed.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

III. Uppskot

til

Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

1. Í § 4 verður 5. punktum strikað, og 4. punktum verður orðað soljóðandi:
   Um so er, at samlaði landsskatturin hjá hjúnafelagum, áðrenn at 28% av samlaðu rentuútreiðslum teirra eru frádrigin, tá vísir hall, kann hetta verða drigið frá í landsskattinum 3 tey næstu árini og soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um landsskattur er til tess, og annars so nógv, sum landsskattur er til.
2. § 7 verður orðað soljóðandi:
   Av royalty, sbr. § 2, 1. stk. c) í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, verður ásett eitt fast gjald uppá 25%. Tann, sum rindar royalty, skal halda aftur hetta avgjald og rinda peningin til Føroya Gjaldstovu. Avgjaldið verður býtt við 40% til avvarðandi kommunu og 60% til landskassan.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi beinanvegin.

Lagtingslov

om

ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af landsskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 4 udgår 5. punktum, og 4. punktum affattes således:
   Hvis nu ægtefællernes samlede landsskat bliver negativ efter fradrag af 28% af deres samlede renteudgifter, kan det negative beløb fradrages i landsskatten for de nærmest efterfølgende 3 indkomstår, således at det fulde beløb fradrages det første år, såfremt det kan dækkes af landsskatten dette år, og ellers så stor en del, der er dækning for.
2. § 7 affattes således:
   Af royalty, jfr. § 2, stk. 1 c) i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives en fast afgift på 25%. Den, som udbetaler royalty, skal indeholde denne afgift og indbetale beløbet til Føroya Gjaldstovu. Afgiften fordeles med 40% til pågældende kommune og 60% til landskassen.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

IV. Uppskot

til

Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um íløgugrunn.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. desember 1971 um íløgugrunnar verður gjørd henda broyting:

§ 3, 1. stk. verður orðað soljóðandi:

Avsetingar til íløgugrunnar kunnu bert verða nýttar til forskotsavskriving av útveganarútreiðslum viðvíkjandi maskinum, innbúgvi og tílíkum rakstrargøgnum, sum verða nýtt vinnuliga burturav, skipum til vinnuliga nýtslu og bygningum sambært § 17, 1. stk., litra a í løgtingslóg nr. 52 frá 29 desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broytingum, sum skattlig avskriving kann verða gjørd av.

§ *2.*

Henda løgtingslóg fær gildi fyri avsetingar til íløgugrunnar, sum verða gjørdar 1. januar 1988 ella seinni.

Lagtingslov

om

ændring i lagtingslov om investeringsfond.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfonds foretages følgende ændring:

§ 3, stk. 1 affattes saledes:

Henlæggelser til investeringsfonds kan kun anvendes til forlods afskrivning pa anskaffelsesudgifter vedrørende maskiner, inventar og lignende driftsmidler, der udelukkende benyttes erhvervsmæssigt, skibe til erhvervsmæssig brug og bygninger, der omfattes af § 17, 1. stk., litra a i lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere ændringer, hvorpa skattemæssig afskrivning kan foretages.

§ *2.*

Denne lagtingslov har virkning for henlæggelser til investeringsfonds, som foretages 1. januar 1988 eller senere.

V. Uppskot

til

Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3 a, 1. stk. 2. punktum, verður orðað soljóðandi:
   Frádrátturin verður at prístalsviðgera 1. juli 1987 við prístalinum 1. juli 1986 sett til 100. Broytingin í frádráttinum verður útroknað hvønn 1. juli og kunngjørd av líkningarráðnum sum galdandi fyri komandi álmanakkaárið.
2. Í § 6, litra b) verður 2. punktum strikað.

§ *2.*

Henda løgtingslóg fær gildi beinanvegin. Broyting 2 fær tó gildi frá og við 29. mai 1985.

Lagtingslov

om

ændring i lagtingslov om beskatning af renteforsikring m.v.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 51 af 29. december 1971 om beskatning af renteforsikring m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. § 3 a, stk. 1, 2. punktum affattes således:
   Fradraget pristalreguleres 1. juli 1987 med pristallet 1. juli 1986 lig med 100. Ændringen i fradraget beregnes hver 1. juli og bekendtgøres af ligningsrådet som gældende for det efterfølgende kalenderår.
2. Litra b) 2. punktum i § 6 udgår.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft straks. Ændring 2 træder dog i kraft fra og med 29. maj 1985.

VI. Uppskot

til

Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, 1. stk. verður peningastovnar broytt til: peningastovnar og postgiro.
2. Í § 1, 2. stk. verður peningastovnarnir broytt til: peningastovnarnar og postgiro.
3. Í § 2 verður peningastovnanum broytt til: peningastovninum og postgiro.
4. Í § 3, 2. stk. verður ávirkavist peningastovnur og peningastovni broytt til: ávirkavist peningastovnur og postgiro og peningastovni og postgiro.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi beinanvegin.

Lagtingslov

om

ændring i lagtingslov om indkomstskat af renter af indestaaende kapital i færøske banker og sparekasser.

§ 1.

I lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indkomstskat af renter af indestaaende kapital i færøske banker og sparekasser foretages følgende ændringer:

1. I § 1, stk. 1 ændres pengeinstitutter til: pengeinstitutter og postgiro.
2. I § 1, stk. 2, ændres pengeinstitutter til: pengeinstitutter og postgiro.
3. I § 2 ændres henholdsvis pengeinstitut og pengeinstitut til: henholdsvis pengeinstitut og postgiro samt pengeinstitut og postgiro.
4. I § 3, stk. 2 ændres henholdsvis pengeinstitut og pengeinstitut til: henholdsvis pengeinstitut og postgiro samt pengeinstitut og postgiro.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broytingar í skattalóggávuni er ein partur av teimum broytingum, sum avráddar vórðu í samgonguskjalinum, tá ið honda samgonga varð skipað. Hesar broytingar eru sostatt eitt náttúrligt framhald av teimum skattalógum og broytingum í skattalóggávuni, sum tingið samtykti í fjør.

Endamálið við uppskotinum er í stuttum at dagføra verandi lóggávu, so hon svarar til tíðarinnar krøv, eins og roynt verður at útbyggja eitt nøvvari skatteeftirlit og eina munadyggari skattaálíkning. Afturat hesum verður miðað eftir at gera avmarkingar í avskrivingarreglunum, so at avskrivingar ikki føra til privata nýtslu, men at tær í størst møguligan mun koma vinnuni til góðar.

Í hesum uppskoti eru framhaldandi gjørdar broytingar við tí fyri eyga at gera greiniligari og meira fullfiggjaðar reglur, so sleppast kann undan misskiljingum og trupulleikum í sambandi við tulkingina av teimum einstøku lógarreglunum.

Tær mest týðandi broytingarnar í løgtingslóg um landsskatt og kommunu skatt (vanliga nevnd samtíðarskattalógin) eru:

Avmarkingar í avskrivingum hjá persónum, so tær verða ikki støri, enn at skattskylduga inntøkan í minsta lagi er líka stór sum skattligu uppgerðin av eginnýtsluni. Er skattskylduga inntøkan aftan á avskrivingar v.m. lægri enn skattliga eginnýtslan, skal inntøkan setast ájavnt við hesa upphædd, men tó so at hækkingin í inntøkuni ongantíð má verða meira enn gjørdar avskrivingar og íleggingar í íløgugrunn.

Henda regla er ætlað at seta úr gildi verandi reglu um, at avskriving hjá persónum kann ikki verða støri enn so, at skattskylduga inntøkan í minsta lagi er líka stór sum livikostnaðurin sambært galdandi prístalsgrundarlag.

Fyri at tryggja eina munadyggari skattaálikning og nøvvari skatteeftirlit verður skotið upp, at peningastovnar, postgirostovan og onnur, sum taka móti peningi til renting og/ella læna pening út móti renting, av teirra eintingum skulu lata líkningarmyndugleikunum upplýsingar um innistandandi og árliga rentu av innistandandi eins og árliga rentuútreiðslur og saldo á útlánskonti.

Ein tílík skipan ber í sær eina sjálvvirkandi flyting av upplýsingum úr peningastovnum o.ø. til líkningarvaldið.

Sjálvvirkandi skipanin merkir eina skjótari álíkning av løntakarunum. Samtíðis ber hon í sær, at ein stórur partur av arbeiðsmegini hjá líkningarvaldinum, sum í dag fæst við løntakaruálíkning, kann setast til líkning av B-inntøkum og feløgum. Afturat hesum kemur, at líkningin av B-inntøkum gerst lættari, tá upplýsingar um inntøku- og ogna rviðurskifti altið verða tøk hjá skattavaldinum og ikki, sum nú er, verða at umbiðja frá peningastovnunum í hvørjum einstøkum føri.

Skipanin er ein fyrimunur hjá A-skattgjaldarum, tí teimum nýtist hvørki at hugsa um fyrihils ella endaliga skráseting av rentuútreiðslun.

Eisini verður tað lættari hjá skattgjaldarum at útfylla ognaruppgerðina, ti sum er fáa skattgjaldarar ikki nakað yvirlit yvir, hvussu nógv stendur inni við ársenda, uttan so at teir sjálvir biðja um tað. Tí ið ognaruppgerðirnar skulu skrivast, eru banka- ella sparikassubókurnar ikki dagførdar, og førir hetta sostatt ofta við sær, at ognaruppgerðirnar verða ófullfiggjaðar.

Samanumtikið eru stórir fyritmunir við einari sjálvvirkandi skipan fyri bæði skattavaldið og skattaborgaran.

Vert er at leggja til merkis, at tær upplýsingar, sum skattavaldið á henda hátt kemur at fáa úr peningastovnunum um tann einstaka skattaborgaran, eru tær somu, sum skattaborgarin eftir gildandi reglum sjálvur hevur skyldu at lata líkningarmyndugleikunum á sjálvuppgávu og ognaruppgerð.

At enda kann vísast á, at tílíkar skipanir eru í okkara grannalondum og virka uttan stórvegis trupulleikar og mótstøðu.

Tann seinasta týðandi broytingin, sum skotin er upp í samtíðarskattalógini, eru broyttar revsireglur.

Tað er ein royndur lutur, at galdandi lógarreglur um revsing fyri skattasvik byggja á eina skipan, sum er gomul og, sum frá er liðið, er orðin alt meira ótíðarhóskandi.

Sambært galdandi reglum er revsingin fyri skattasvik ásett til sekt svarandi til 1 til 5 ferðir ta peningaupphædd, sum tikin er frá ti almenna í skatti.

Reglubundin mannagongd hevur tó higartil verið at eingin er revsaður við meira enn 1 ferð ta upphædd, sum á hendan hátt er tikin frá ti almetnu.

Landsstýrið meinar, at tíðin er farin frá einari slíkari skipan, og skjýtur tí upp, at reglurnar verða gjørdar meira liðiligar, so at revsingin eisini verður ásett í mun til misbrotið og tey serstøku viðurskifti, sum galdandi eru í hvørjum einstøkum føri.

Broytingin miðar eftir, at revsingin fyri álvarsligu misbrotini verður hækkað til varðhald og undir serliga skerpandi umstøðum til longsut upp í 2 ár.

Meginreglan um at áleggja sekt verður tó varðveitt sum higartil, tó so at álagda sektin nú eisini verður tengd at sjálvum misbrotinum.

Skotið verður upp, at lað í staðin fyri Føroya Landsstýri verður Likningarráð Føroya, sum avger, um sekt skal áleggjast, og hvussu stór hendan skal verða.

Líkningarvaldið eins og skattgjaldarin skal tó framvegis hava krav uppá, at málið verður avgjørt við rættargangi, um ikki semja fæst í lag millum partarnar.

Í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. (vanliga nevnd avskrivingarlógin) verður skotin upp, m.a. tann broyting, at serligar avmarkingar verða at galda fyri avskrivingar av útvegsnarpeningunum fyri persónbilar, sum annars bert nýtir vinnuliga, og sum eru skrásettir til privatan persónfrátrokning, tað merkir allir persónbilar, sum hava fleiri setur enn tað hjá bilstjaranum og tað við síðuna av honum.

Reglan er galdandi, fá ið útvegsnarpeningurin fer upp um 150 000 kr., so at ikki kann avskrivast av tí partinum av útvegsnarvirðinum, sum er hægri enn

150.000 kr. Hesin parturin skal hinvegin farast sum ein serstakur aktivpostur, sum ikki kann avskrivast í skattaroknskapinum.

Víst verður annars á nágreiniligari viðmerkingar til § 5a í avskrivingarlógini seinni í hesum skjali.

Ein onnur broyting, sum verður skotin upp at gera í avskrivingarlógini, ber í sær, at tað nú verður loyvt at gera skattligar avskrivingar av grótkasti v.m., sum gjørt er til vinnuliga fiskaaling.

Sum rættarstøðan er, kunnu tílík alibrúk ikki avskrivast, meðan loyvt er at avskriva t.d. aliringar, tí hesir koma undir reglurnar viðvíkjandi rakstrargøgnum í avskrivingarlógini.

At enda skal nevnast, at landsstýrið væntar ikki, at broytingarnar í skattalógunum, sum nú eru lagdar fram, fara at kosta landskassanum pening. Tá ið endamálið við hesum uppskotinum sum nevnt er at gera reglur, sum bera í sær munadyggari skattaálíkning og neyvari skattaeftirlit, væntar landsstýrið hinvegin, at broytingarnar við tíðini fara at geva landskassanum nakað av meirinntøku. Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

1. Løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

§ 1.

1) *§ 21, 2. stk.:* Í sambandi við broytingar í revsireglunum er skotið upp, at likningarráðið fær heimild til at áleggja dagsektir. Hesa heimild hevur landsstýrið frammanundan.
2) *§ 24, 2. stk.:* Broytingin er neyðug, fyri at samsvar skal vera millum § 1 og hesa grein.
3) *§ 25, nr. 3:* er ein fylgjubroyting stavandi frá, at skotið er upp at broyta lógina um skatt av rentum, sum standa í føroyskum peningastovni, til eisini at fevna um innistandandi á postgirtu.
4) *§ 26, 3. stk.:* Grannskoðarar, skattamyndugleikar og onnur, sum dagliga hava við skattaspurningar at gera, hava ásannað, at tørvur er á nágreiniligari reglum fyri, hvussu vørugoymslur eiga at gerast upp og virðisásetast. Skotið verður tí upp, at likningarráðið fær heimild til at ásetta nærri reglur fyri vørugoymslur í kunngerð.
5) *§ 29, nr. 1):* Endamálið við hesari broyting er einans at dagføra reglurna, so orðingin er í tráð við tær broytingar, sum fram eru farnar í skattalóggávuni seinastu árini.
6) *§ 31, 1. stk., lítra e):* Henda broyting ber í sær, at galdandi avmarking í avskrivingum hjá persónum (avskrivast má ikki meira enn so, at skattskyldiga inntøkan í minsta lagi er lika stór sum livikostnaðurin eftir pristalsgrundarlagnum) fellur burtur. Skotið verður upp at avmarka avskrivingarmøguleikarnar hjá persónum eftir øðrum reglum, jbr. viðmerkingarnar til broytingarnar 7)-11) niðanfyri.

7-11)

§ 31, 2. stk., 6. stk.: Eftir galdandi reglum má avskrivingin hjá persónum ikki verða størri enn so, at skattskylduga inntøkan í minsta lagi er líka stór sum livikostnaðurin eftir tí til eina og hvørja tíð galdandi prístalsgrundarlag.

Endamálið við hesum broytingum er at avmarka avskrivingarnar, forskotsavskrivingar og íleggingar í íløgugrunn hjá persónum soleiðis, at hesar ikki verða størri enn so, at skattskylduga inntøkan í minsta lagi er líka stór sum skattliga uppgerðin av eginnýtsluni. Har skattskylduga inntøkan aftan á avskrivingar v.m. er lægri enn skattliga eginnýtslan, skal inntøkan setast ájavnt við hesa upphæddi, men tó soleiðis, at hækkingin í inntøkuni ongantíð má verða meir enn gjørdar avskrivingar og íleggingar í íløgugrunn.

Sambært 3. stk. skal landsstýrið áseta nærri reglur um, hvussu skattliga eginnýtslan skal gerast upp. Í hesum reglum verður gingið út frá, at bert tær útreiðslur, sum ikki kunnu dragast frá, tá skattskyldug inntøka verður gjørd upp, skulu roknast við í eginnýtsluna. Tað verður hildið at vera beinast, at landsstýrið áseting slíkar reglur við kunngerð, tí hesar skulu verða nøkulíga nágreiniligar.

Sambært 4. stk. skal hetta lógaruppskot tó ikki fevna um tær avskrivingar, sum eru bundnar til tað ávísa árið, eitt nú avskriving av goodwill. Tí hesar annars verða mistar.

Sambært 5. stk. missa persónar, sum hava fingið skattskyldugu inntøkuna hækkaða eftir 2. stk., ikki rættin til hesar avskrivingar, tí hesar verða mettar sum ikki gjørdar tað árið, inntøkan verður hækkað, og flutningur til seinni ár.

6. stk. Í lógaruppskotinum ásetur, at tað er samlaða inntøkan hjá hjúnum, sum eru samskattað við enda inntøkuársins, ið skal takast við, tá ið eginnýtslan verður gjørd upp. Samuleiðis er tað samlaða ogn og skuld teirra við byrjan og enda inntøkuársins, ið roknast skal við í slíkari uppgerð.

Hvønn lógarbroytingin fevnir um

Lógarbroytingin fevnir bert um skattskyldugar persónar, sambr. §§ 1 og 2 í samtíðarskattalógini, men ikki feløg v.m., sum verða sett í skatt eftir reglunum fyri partafeløg. Heldur ikki fevnir lógin um deyðsbúgv. Persónar, sum hava tikið bústað her, soleiðis at skattskyldan fevnir um minni enn eitt ár, koma eisini undir hesa reglu.

Skattskyldug inntøkan, sum skal takast við í uppgerðina

Við í uppgerðini er skattskylduga inntøkan hjá ti skattskyldugu og sum skattaða hjúnafelaga gjørd upp eftir reglunum í skattalógini annars, herundir møguligt hall frá árunum frammanundan. Um hin skattskyldugi er

giftur í inntøkuárinum, skal eginnýtslan gerast upp undir eintum hjá hjúmm fyri alt árið. Slík uppgerð fevnir um samlaðu ársinntøku hjúnanna. Eginognin hjá hjúnunum við byrjan og enda inntøkuársins skal tó verða grundarlagið fyri uppgerðini av eginnýtsluni fyri inntøkuárið. Sama ger seg galdandi, har annar hjúnafelagin doyr, um eftirsitandi hjúnafelagin í beinleiðis sambandi við andlátið velur at sita í óskiftum búgv. ella búgvið ikki verður skift sambært § 14, 9. stk. Tá ið skattskylduga inntøkan hjá einum skattskyldugum persóni, sum er sundurlisin ella skildur í inntøkuárinum, verður gjørd upp, verður bert hansara skattskylduga inntøka við í uppgerðini. Sama ger seg galdandi, um annar hjúnafelagin doyr í inntøkuárinum, og búgvið verður skift beint aftan á andlátið. Eisini tá endalig álíkning hjá tí deyða sambært § 40 í samtíðarskattalógini verður gjørd, skal verða sæð burtur frá inntøkuni hjá eftirsitandi hjúnafelaga, tá ið uppgerðin av eginnýtsluni hjá tí deyða verður gjørd.

Uppgerð av eginnýtsluni

Sambært 3. kap. í »Kunngerð um minstukrøv til roknskap frá 28. november 1978« skal í sambandi við fíggjarstøðuna frágreiðing verða gjørd um broytingar í eginognini. Saman við ognaruppgerðini vil slík frágreiðing geva grundarlag fyri einari uppgerð av eginnýtsluni sambært hesi lóg og tí kunngerð, sum landsstýrið ger sambært 3. stk. Eginnýtslan, sum skal leggjast til grund fyri einari møguligari avmarking av avskrivingunum v.m., er tann sama, sum vanliga verður nýtt av skattamyndugleikunum, tá ið roknskapirnir verða kannaðir. Her verður kannað, um tann skattskylduga inntøkan saman við broytingum í ognini í árinum geva pláss fyri einari rímiligari eginnýtslu. Skattafyrisitingin skuldi tí ikki fingið álagt størri uppgávur av hesum lógarbroytingum, enn hon hevur frammanundan.

Heldur ikki skuldi hetta uppskot álagt teimum, sum gera roknskap, eitt nú grannskoðarum, størri arbeiðsuppgávu, tí teir longu í dag í sambandi við teir roknskapir, teir gera, kanna, um tann skattskylduga inntøkan saman við broytingum í ognini í árinum gevur pláss fyri einari rímiligari eginnýtslu.

Tá ið tað longu í dag í stóran mun verður gjørd ein uppgerð av tí skattligu eginnýtsluni, bæði av skattafyrisitingini og teimum roknskaparskyldugu, so má hetta hugtak saman við einari neyvari kunngerð um, hvussu tað skal gerast upp, eisini kunna nýtast sum grundarlag fyri einari avmarking av avskrivingunum, sum tó ikki ger, at nakar missir hesar avskrivingar, men bert ger, at tær verða skotnar út til seinni ár.

Tann skattliga eginnýtslan kann verða gjørd upp óbeinleiðis við inntøku- og ognargongilini gjøgnum árið sum grundarlag. Eisini kann skattliga eginnýtslan verða gjørd upp beinleiðis, um skattskyldugi ársroknskapurin fevnir um allar inntøkur og útreiðslur og alla ogn og skuld við byrjan og enda

roknskaparársins, og um roknskapurin annars kann leggjast til grund fyri álíkningini.

Ofta koma vit út fyri, at eginnýtslan skal gerast upp óbeinleiðis, tí ein partur av teimum upphæddum, sum hava ávirkan á eginnýtslnna, ikki er skrásettur í roknskapinum, men á ognartuppgerðini. Roknskapurin hjá einum bókhaldsskyldugum persóni skal eisini vísa eina ognarfrágreiðing, men tá ið slík oftast bert fevnir inntøkur og útreiðslur og ogn og skuld í virkinum, vil ein slík frágreiðing oftast ikki vísa tað rætta eginnýtsluna. Neyðugt verður tí við einari óbeinleiðis uppgerð av eginnýtsluni, sum eitt nú hetta dømi vísir:

1. Eginogn við ársbyrjan
   a) skattskyldug inntøka
   b) ognarvøkstur, sum ikki er við í skattskyldugu inntøkuni
   c) upphæddir, sum eru drignar frá, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp, men sum ikki hava minkað um ognina.
   d) ikki skattskyldugur ognarvøkstur, sum kemur fram við virðisbroytingum av ognini.
2. Frá samlaðu upphæddini undir pkt. 1 verður drigið:
   a) ognarminking, sum ikki er drigin frá, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp, men sum ikki kann roknast við í eginnýtsluna
   b) skattskyldug inntøka, sum ikki hevur økt um ognina
   c) ognarminking, sum kemur fram við virðisbroytingum av ognini, men ikki kann dragast frá, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp.
   d) Eginogn við árs enda.

Skotið verður upp, at broytingarnar fáa gildi frá og við inntøkuárinum 1987.

12) *§ 33, nr. 4):* Sambært hesi broyting fær landsstýrið heimild til við kunngerð at áseta eitt loft fyri upphæddirnar til vísturhald, sum loyvdar verða at draga frá í skattauppgerðini. Í somu kunngerð kunnu ásetast reglur fyri krøv til skjalprógv og útgreinan av tíðkum útreiðslum. Rættast er at gera vart við, at líkningarmyndugleikarnar sjálvsagt hava rætt til at seta krøv til skjalprógv og útgreinan av útreiðslum uttan sjálvstøðuga lógarheimild.

13) *§ 33, nr. 7):* Broytingin ber í sær, at løntakarafrádrátturin verður prístalsviðgjørdur eftir prístalinum 1. juli á hvørjum ári mótvegis 1. oktober.

14) *§ 33, nr. 12):* Tap uppá skuldarar hevur hígartil verið drigið frá í inntøkuuppgerðini sambært óskrivaðum reglum. Talan hevur tó ikki verið um, at skattaborgararnir hava fylgt somu mannagongd.,

Fyri at fáa eina samlika mannagongd, tá ið tað snýr seg um at draga frá tap uppá skuldarar, herundir útláns- og ábyrgdarskuldarar hjá peningsstovnum, í inntøkuuppgerðini, verður skotið upp at seta hesa reglu inn í lógina sum nýtt nr. 12 í § 33.

15) *§ 46, 2. stk.:* Broytingin hevur sum endamál at nágreina galdandi manna-

gongd, so tað greitt verður orðað í lógini, at hall í kommunuskattinum vegna rentufrádrátt kann verða drigið frá í kommunuskattinum 3 tey næstu árini.

16) § *48, 2. stk.:* Broytingin er neyðug fyri, at samsvar skal vera millum § 1 og hesa grein.

17) § *75, 2. stk.:* Talan er um at rætta orðið »renta« til »endurgjald«.

18. § *77, 1. stk., litra b)* Talan er um at rætta »§ 16i« til »§ 130«.

19) § *79, 4. stk.:* Talan er um at broyta orðingina í § 79, 1. stk., so aftangjalding av avlopsskatti kann fara fram áðrenn 1. oktober í álíkningarárinum.

20) § *81, 1. stk.:* Broytingin er neyðug fyri, at samsvar skal vera millum § 1 og hesa grein.

21) § *81, 2. stk.:* er ein fylgjubroyting stavandi frá broyting í revsireglunum.

22) § *94, 2. stk.:* Skotið verður upp at strika heimildina hjá kommunalu líkningarvaldunum at kæra avgerðir líkningarráðsins til landsskattanevndina, tá ið ein tílíkur møguleiki ikki samsvarar við tann sið, sum galdandi er innan fyrisitingarliga rættarøkið, eins og henda heimild gongur ímóti teimum reglum, sum ásettar eru at vera uppgávur líkningarráðsins í hesari lóg.

23) § *99, 5. stk.:* Fyri at økja um rættartrygdina verður skotið upp, at ein úrskurður hjá landsskattanevndini skal skjótast inn fyri Føroya Rætt, innan 6 mánaðir eru farnir. Annars er avgerð nevndarinnar endalig, so at skilja, at hon bindur bæði borgara og skattavald.

24) § *100, 3. stk.:* Henda broytingin ber í sær, at innlating av sjálvuppgávum verður ásett til í seinasta lagi 15. mars, mótvegis 15. februar. Uppgávan skal nú lastast líkningarráðnum mótvegis áður kommunala líkningarvaldinum.

25) § *103, 3. stk., 2. punktum:* Broytingin ber í sær, at líkningarmyndugleikarnir umframt roknskapir eisini kunnu tvinga sjálvuppgávuna inn við at áleggja dagligar sektir.

26) § *105, 2. stk.:* er ein fylgjubroyting stavandi frá broytingini í § 100, 3. stk.

27) § *106:* er ein fylgjubroyting stavandi frá broyting í revsireglunum.

28) § *119, 1. stk.:* Fyri at tvinga fram roknskapartilfar frá skattgjaldara, sum rekur vinnu, verður skotið upp, at líkningarráðið fær heimild til at áleggja dagliga sekt, til tilfarið er útflýggjað.

29-31)

§§ *119, 3. stk. - 119, 5. stk.:* Hesar broytingar verða skotnar upp fyri at útvega neyðuga lógarheimild til at fáa hjálp frá løgregluni í sambandi við líkningarráðsins eftirlit sambært § 119.

32) § *120 a:* Eftir hesari grein skulu bankar, sparikassar v.m., sum taka ímóti peningi og øðrum virðum til umsiting ella vinnuliga læna pening út, eftir áheitan láta líkningarráðnum allar upplýsingar um innistandandi pening, lángoymslur ella boks hjá navngivnum persónum, tá ið tað hevur týdning fyri skattaálikningina, at hesar upplýsingar kunnu útvegast. Soleiðis kunnu upplýsingar krevjast um støðd av lánum og innistandandi v.m. smbr.

1. stk. Eisini er heimild til eftir avgerð líkningarráðsins at krevja upplýsingar sbr. 1. stk. hjá ikki navngivnum personum.

Í 2. stk. er heimilað líkningarmyndugleikunum eftir nærri fyriskipan líkningarráðsins í samstarvi við bankar, sparikassar v.m. at koma á stað hjá hesum og hvar ganga igjøgnum roknskapartillar, fylgiskjol v.m., sum eru nevnd í § 119, 2. stk. Somuleiðis tryggja sær upplýsingar eftir 1. stk.

33) § *120 b:* Við hesari grein verður álagt banknum, sparikassum, postgyrostovum og øðrum eina »sjálvvirkandi« upplýsingarskyldu mótvegis líkningarvaldinum, soleiðis at latast skulu upplýsingar um upphædd av intrum ella góðskrivaðum rentum í árinum frammanundan. Samstundis skal upphædd av tí innistandandi á teim rentuberandi konti við árslok upplýsast.

Tá ið tað møguliga kann vera tørvur á at lata onnur, sum renta innistandandi ella líknandi, sum annar persónur eigur, t.d. »juridiskar persónar« koma undir upplýsingarskyldona, verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild at áseta nærri reglur um hetta. Upplýsingarnar frá teimum, sum hava skyldu at lata upplýsingar, skulu umframt navn og bústað innihalda persóntal ella arbeiðsgevaratal kontoeigarans.

Landsstýrið kann gera avmarkingar í upplýsingarskipanini, lævi viðvíkjandi hvør skal hava upplýsingarskyldu, og støddi og slag av teimum upphæddum, sum skulu fráboðast.

Viðvíkjandi konti, sum hoyra til persónar, sum hava bústað uttanlands, verður landsstýrinum heimilað at áseta nærri reglur.

34) § *120 c:* Fyri at upplýsingarskipanin kann virka, er tað neyðugt at áseta, at upplýsast skulu persóntal ella arbeiðsgevaratal kontohavarans.

Haraftrat mugu aðrar upplýsingar latast, sum eru neyðugar fyri at vita, hvør ið kontohavarin er, men tá ið hesar upplýsingar kunnu vera ymiskar fyri einstakar bólkar av kontohavarum, verður mælt til, at nærri reglur um hetta kunnu ásetast av landsstýrinum.

Somuleiðis kann landsstýrið áseta reglur um, hvørji prógv skulu vísast í sambandi við stovnan av konti.

35) § *120 d:* Fyri at lætta um mannagongdina við at fáa konti útgjørdar við upplýsingum um persóntal ella arbeiðsgevaratal kontohavarans verður mælt til, at líkningarráðið skal kunna geva teimum, sum hava upplýsingarskyldu, neyðugar upplýsingar.

36) § *120 e:* Grundað á eftiransingina við, at øll tey, sum koma undir upplýsingarskylduna viðvíkjandi rentum, eisini lúka teirra skyldur, kann vera neyðugt at stovna eina skrá yvir tey, sum hava hesa skyldu.

37) § *120 f:* Orsakað av eftirlitinum við, at tær upplýsingar, sum verða latnar líkningarráðnum viðvíkjandi rentum og innistandandi, eru rættar, tá møguleiki vera fyri at føra eftirlit við roknskapum hjá teimum, sum hava upplýsingarskyldu viðvíkjandi rentutilskrivingini.

38) § *120 g:* Tann uppskotna upplýsingarskipanin skal ikki fevna um konti, ið

hoyra til limir hjá kongahúsinum, ið eru undantiknir skattskyldu. Kunti hjá útlendskum umboðum, sbr. § 3, 1. stk. litra d í skattalógini, verða tilmæltar undantiknar eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetur.

39) § *120 h:* Í 1. stk. verður ásett, hvørji hava skyldu at lata upplýsingar um rentuútreiðslur v.m. til líkningarvaldið. Landsstýrið kann tó áseta, at onnur, sum læna pening út ella á annan hátt eru millummenn á líknandi hátt fyri útlán, eisini skulu koma undir upplýsingarskylduna. Her kann hugsast, at figgjarfyritøkur og onnur, sum lata lán á sama hátt sum peningastovnar v.m., kunnu koma undir upplýsingarskylduna.

Avgerandi fyri upplýsingarskylduna er, at talan er um útlán, sum verða latin ella gjøgnum millummann verða latin innóti renting, og at hetta fer fram sum liður í útlænarans vinnu.

Kredittveiting og ognan av kreditorrættindum í sambandi við eitt útlán kemur eisini undir hesa grein.

Við at taka »millummenn« av útlánum við, verður tryggjað, at veðhaldslánsstovnar v.m., sum ikki beinleiðis læna út, koma undir upplýsingarskylduna.

Samhært 2. stk. skal fráboðanin innihalda upplýsingar til samman av lántakara og upplýsingar um konto- og lánviðurskifti. Tann, ið sum skuldari hevur yvirtikið eitt verandi lán, verður eisini at meta sum lántakari.

Tann, sum hevur upplýsingarskyldu, skal fyri hvørt útlán upplýsa:

1) slag av láni,
2) støddd av tilskrivaðum ella falnum rentum. Tað hevur ongan týdning, um nakað er goldið.
3) støddd av provisión v.m.
4) støddd av skuldini pr. 31. december í árinum frammanundan og
5) upplýsingar, sum landsstýrið krevur sbrt. 3. stk.

Tey, sum hava upplýsingarskyldu, skulu sbrt. 5. stk. boða lántakaranum frá, hvørjar upplýsingar verða latnar til líkningarmyndugleikarnar. Fráboðanin skal gerast í seinasta lagi 1. februar í árinum aftan á álmanakkaárið, sum upplýsingarnar viðvikja. Hetta til tess at tryggja, at lántakarin, tá ið hann skal gera sjálvuppgávuna, hevur kunnleika til tær upplýsingar, sum líkningarmyndugleikarnir nýta í sambandi við skattaálikningina.

Landsstýrið kann áseta, at frúboðanin skal fevna um aðrar upplýsingar um lánið.

40) § *120 j:* Í 1. stk. eru nevnd onnur dømi um, hvørji hava upplýsingarskyldu. Tann, sum hevur hesa skyldu, skal fyri hvørt pantibrøv fráboða

1) støddd av tilskrivaðum ella gjaldkomnum rentum í árinum frammanundan,
2) støddd av restskuld pr. 31. december og
3) Áljóðandi virði av restskuld pr. 31. december.

Samhært 4. stk. verður álagt teimum, sum hava upplýsingarskyldu, at

boða frá, hvørjar upplýsingar eru latnar skattavaldinum. Frábodanarskyldan er galdandi bæði yvir fyri skuldarunum og goymsluhavarunum.

Landsstýrið kann áseta, at frábodanin skal innihalda aðrar upplýsingar um pantibrøv, sum liggja á goymslu.

41) *§ 120 k:* Til tess at teir, sum hava upplýsingarskyldu, kunnu lata upplýsingar eftir reglunum í § 120 h og 120 j, mugu husir hava kunnleika til upplýsingar til sannan av lántakara (herundir skuldara sambært pantibrævi á goymslu) umframt goymsluhavara. Tessvegna verður mælt til, at viðkomandi lántakarar og goymsluhavarar hava skyldu til at lata teimum, sum hava upplýsingarskyldu, upplýsingar til sannan av lántakara ella goymsluhavara. Tað snýr seg her serliga um persóntal.

42) *§ 120 l:* Eftir hesi reglu kann verða álagt einum, sum hevur upplýsingarskyldu, dagliga sekt, um hann ber seg undan sínari skyldu.

43) *§ 120 m:* Reglan skal tryggja, at tann, sum hevur upplýsingarskyldu, ikki kann lata persóntal til onnur.

44) *§ 120 n:* Í hesari grein verður heimilað landsskattanevndini at krevja upplýsingar í sambandi við kæruviðgerð, har tað er heimilað líkningarmyndugleikunum at krevja upplýsingar í sambandi við skattaálikuingina.

45)-47)

§§ 125, 4. stk. - 125, 5. stk. og § 127, 1. stk.: Broytingarnar bera í sær at ávisingarskyldugir kunnu revsast við sekt, um teir bera seg undan at gera eftir teimum krøvum, sum ásett eru í 2. og 3. stk.

Í sambandi við broytingar í revsireglunum er skotið upp, at líkningarráðið fær tær heimildir til at áleggja dagsektir, sum landsstýrið hevur frammanundan.

48) *§ 127, 2. stk.:* er ein fylgjubroyting av broytingum í revsireglunum.

49) *§ 135, 3. stk.:* Endamálið við broytingini er beinleiðis at áseta í hesari lóg, at eisini sekt, sum skal gjaldast tí almenna eftir lógini, kann krevjast inn við panting eftir reglunum í ríkislóg nr. 85 frá 30/3 1935 um innkrevjing av skattum og avgjøldum.

50)-61)

§§ 139-150: Hesar broytingarnar eru eitt uppskot til nýggjar revsireglur fyri skattasvik v.m.

Tað er ein royndur lutur, at galdandi lógarreglur um revsing fyri skattasvik byggja á eina skipan, sum er gomul og sum frá er liðið er vorðin alt meira ótíðarhóskandi.

Sambært galdandi reglu er revsingin fyri skattasvik ásett til sekt svarandi til 1 til 5 ferðir ta peningaupphædd, sum tikin er frá tí almenna.

Reglubundin mannagongd hevur tó higartil verið, at eingin er revsaður við meira enn eina ferð ta upphædd, sum á hendan hátt er tikin frá tí almenna.

Tá ið tíðin er farin frá einari slíkari skipan, verður skotið upp, at reglurnar verða gjørdar meira liðiligar, so at revsingin eisini verður ásett í mun til mis-

brotið og tey serstøku viðurskifti, sum kunnu gera seg galdandi í tí einstaka førinum.

Broytingin miðar eftir, at revsingin fyri álvarsligu misbrotini verður hækkað til varðhald og undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul upp í 2 ár.

Meginreglan um at áleggja sekt verður tó varðveitt sum higartil, tó so at álagda sektin nú eisini verður tengd at sjálvum misbrotinum.

Undir meginregluna um skattasvik koma nú somuleiðis tey misbrot, sum staðfest verða í sambandi við, at persónur letur vera við at avrokna A-inntøku ígjøgnum tey av landsstýrinum góðkendu avrokningarstøð ella tekur ímóti A-inntøku vitandi um, at A-skattur sum ásett er ikki avroknaður í hesi inntøku.

Áður var serstøk regla ásett um brot á hesa reglu.

Meginreglan fevnir nú somuleiðis um tann, sum við vilja ella av stórum gáloysni gevur rangar ella villleiðandi upplýsingar um ávis viðurskifti, sum hava týdning fyri, hvussu eitt mál verður loyst, og annars, hvussu álíkningin verður framd.

Reglan um, at tað er landsstýrið, sum áleggur sektina, er somuleiðis broytt, so tað í staðin verður líkningarráðið, sum avger, um sekt skal áleggjast, og hvussu stór henda skal verða.

Líkningarvaldið eins og skattgjaldarin hevur tó framvegis krav uppá, at málið verður avgjørt við rættargangi, um ikki semja fæst í lag partanna millum.

Við teimum frávikum, sum eru nevnd omanfyri, eru galdandi reglur um revsing fyri brot á hesa lóg í høvuðsheitum varðveittar óbroyttar.

62) § *153, 1. stk.:* er fylgjubroyting stavandi frá broytingunum í revsireglunum.

§ 2.

Mælt verður til, at reglurnar um upplýsingarskyldu fáa gildi fyri rentur, sum verða tilskrivaðar ella góðskrivaðar aftan á 31. desember 1987 og seinni ár. Fráboðan um innistandandi í bankum og sparikassum v.m. skal fyrstu ferð latast um innistandandi við árslok í 1988. Av praktiskum grundum kann landsstýrið tó áseta serligar avmarkingar fyri upplýsingarskylduna tað fyrsta árið.

Somuleiðis verður mælt til, at reglurnar um upplýsingarskyldu sbrt. § 120 h og 120 j fyrstu ferð skulu galda fyri álmanakkaárið 1988. Landsstýrinum verður heimilað at áseta ávísar reglur fyri ávís upplýsingarskyldug, soleiðis at hesi kunnu lata upplýsingarnar seinni enn fyri álmanakkaárið 1988. Orsakað av møguligum praktiskum og tekniskum fyribeikingum av fráboðanarskylduni viðvíkjandi pantibrøvum, sum verða umsitin, kann tað vísa seg neyðugt at bíða við at seta hesa skipan í gildi til í 1989. Tí verður mælt til, at landsstýrið fær heimild at áseta, at fráboðanarskyldan sbrt. § 120 j skal ikki galda fyri álmanakkaárið 1988.

II. Løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broytingum.

1) § 2, *1. stk.:* Broytingin er einans ein dagføring av orðalagnum í greinini, so tað samsvarar við áður gjørdar broytingar í skattalóggávuni og hjálagda uppskotið til nýggja § 5 a í hesi løgtingslóg.

Skotið verður upp, at fiskireiðskapur verður viðgjørdur eftir serri reglum, sum líkningarráðið við kunngerð ásetur.

2) § 2, *2. stk.:* Í sambandi við tær broytingar, sum vórðu gjørdar í avskrivingarlógini í fjør, fall tann regla burtur, sum heimilaði avskriving av ávikavist innleggingum og innrættingum.

Ásannandi, at tað er tørvur á í skattligu uppgerðini at avskriva innleggingar og innrættingar í sambandi við vinnuvirksemi í leigaðum holum, so verður skotið upp, at slíkar íløgur kunnu avskrivast, tá ið hølini eru í bygningi, sum eigarin kann avskriva eftir § 17 í hesi lóg.

Avskrivingarnar skulu gerast yvir eitt tíðarskeið av somu longd, sum leigumálið fevnir um, tó yvir eitt tíðarskeið, sum er ikki styttri enn 10 ár. Um so er, at innleggingarnar ella innrættingarnar verða avhendaðar, kunnu ikki avskrivaðar íløgur í hesar dragast frá í nøguligum søluprisi. Ikki avskrivaðar innleggingar og innrættingar kunnu dragast frá tað árið, virkið heldur uppat.

Eisini verður skotið upp at loyva avskriving á sama hátt sum frammanfyri tilskilað av innleggingum og innrættingum í leigaðum hølum í bygningi, sum ikki kann avskrivast sambært avskrivingarlógini, tá ið hølini verða brúkt til ídnaðarframleiðslu burturav.

Í hesum sambandi skal hugtakið »ídnaðarframleiðsla« skiljast sera avmarkandi. Talan skal vera um veruliga ídnaðarframleiðslu og ikki tað, sum vanliga kemur undir hugtakið handverk. Vanligt handverkaravirksemi, eitt nú hárfríðkanarstovur, bilverkstøð o.s.fr., kemur sostatt ikki undir hugtakið ídnaðarframleiðsla.

3) er ein fylgjubroyting stavandi frá broyting 4).

4)-7)

Í § 5 a, 1-3. stk. verða gjørdar serligar reglur um skattligar avskrivingar av útveganarpeninginum fyri persónbilar, sum ánarin bert nýtir vinnuliga, og sum eru skrásettir til privatan persónflutning, t.v.s. allir bilar, sum hava fleiri setur enn tað hjá bilstjóranum og tað við síðuna av honum. Reglurnar fevna tí ikki um bussar og lastbilar, sum eru skrásettir til buss- og lastbilkoyring.

Reglan er eisini galdandi fyri teir persónbilar, sum eitt virki hevur ognað sær til nýtslu hjá einum av starvsfólkunum. Tað hevur heldur ongan fýdning, um hetta starvsfólkið nýtir persónbilin heilt ella partvist til privata koyring.

Reglurnar eru bert galdandi fyri umrøddu persónbilar, tá ið útveganarpeningurin á persónbilinum fer upp um 150.000 kr. Tá ið útveganarpeningurin er 150.000 kr. ella lægri, verða higartil galdandi reglur í kap. 1 í avskrivingarlógini nýttar. Hetta ger seg eisini galdandi fyri persónbilar, sum av fyrstan tíð eru útvegaðir fyri minni enn 150.000 kr., og sum seinni hava fingið ábøtur fyri eina upphædd, sum saman við upprunaligu útveganarupphæddini er hægri enn 150.000 kr.

Reglurnar í 1.-3. stk. avmarka tær skattligu avskrivingarnar fyri umrøddu bilar, soleiðis at ikki kann avskrivast av tí partinum av útveganarvirðinum, sum er hægri enn 150.000 kr. Um tann upprunaliga útveganarupphæddin er hægri enn 150.000 kr., kann heldur ikki verða avskrivað uppá útreiðslur til ábøtur.

Hetta ber eisini í sær, at útveganarpeningurin fyri umrøddu bilar ikki kann leggjast aftrat saldovirðinum á øðrum rakstrargøgnum hjá tí skattskylduga, men má býtast upp í tveir partar fyri hvønn bil sær, og tann parturin av útveganarvirðinum, sum er hægri enn 150.000 kr., skal førast sum ein serstakur aktivpostur fyri hvønn bil sær, sum ikki kann avskrivast í skattaroknskapinum, sum skal fylgja við sjálvuppgávuni.

Hin parturin av útveganarvirðinum, 150.000 kr., er tann parturin, sum skattligar avskrivingar kunnu verða gjørdar av sambært hesi lóg, og avskrivingar skulu eins og avskrivingar sambært Kap. 2 í avskrivingarlógini gerast fyri hvønn bil sær eftir vanligu saldohættinum.

Sambært 4. stk. kann ikki verða avskrivað tað árið, bilurin verður seldur. Eisini eru serligar reglur um vinning og tap, tá ið ein bilur, sum kemur undir reglurnar í § 5 a, verður seldur. Hetta kann best lýsast við tremum dømum.

Ein persónbilur, sum er keyptur í apríl 1987 fyri 200.000 kr., verður býttur upp í ein avskrivingarbæran part (I) og ein ikki avskrivingarbæran part (II)

Dømi I:	(I)	(II)
	kr.	kr.
Útveganarprísur 1987	150.000	50.000
Avskrivingar 1987, 30%	-45.000	
	105.000	
Ábøtur á bilin í 1988		5.000
Avskriving í 1988 30%	31.500	
Ikki avskrivaðar upphæddir (I) + (II)	73.500	55.000
Søla í 1989		kr. 150.000
— ikki avskrivað (I) + (II)		kr. 128.500
Vinningur		kr. 21.500

sum verður tikin við sum skattskyldug inntøka í 1989.

Dømi 2:

Bilurin seldur í 1989 fyri	kr. 120.000
— ikki avskrivað (I) + (II)	kr. 128.500
Tap	kr. 8.500

men tá ið tapið er minni enn 55.000 kr. (II), kann tað ikki verða drigið frá, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp.

Dømi 3:

Bilurin seldur í 1989 fyri	kr. 50.000
— ikki avskrivað (I) + (II)	kr. 128.500
Tap	kr. 78.500
Herfrá verður drigið (II)	kr. 55.000
Restupphædd	kr. 23.500

sum kann verða drigin frá, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp.

Sambært 5. stk. a) verður roknað sum keyp og søla, um ein bilur, sum kemur undir reglurnar í 5 a, verður fluttur til aðra nýtslu. Keyps- og søluprísurin verður tá tann prísur, sum kann fáast fyri bilin í vanligum handli.

Sambært 5. stk. b) verður reglan í § 31 eisini nýtt, tí ein bilur, sum bert hevur verið nýttur vinnuliga, t.d. ein vørubilur, sum ikki hevur verið undir reglunum í § 5 a, 1. stk. Henda reglan er tá bert galdandi, um bilurin, tá ið hann verður fluttur til aðra nýtslu, hevur eitt virði í vanligum handli, sum er hægri enn 150.000 kr.

Í Kap. 2 verða gjørdar broytingar í avskrivingunum av rakstrargøgnum, sum bæði verða nýtt vinnuliga og privat, sokallað blandað rakstrargøgn. Broytingarnar her eru tí ikki bert galdandi fyri bilar. Reglan í § 7, 2. stk. avmarkar tær skattligu avskrivingarnar av blandaðum rakstrargøgnum soleiðis, at ikki kann avskrivast av tí partinum av útveganarvirðinum, sum er hægri enn 150.000 kr. Hesin partur skal førast sum ein serstakur aktivpostur fyri hvørt rakstrargagn sær og kann ikki avskrivast í skattarokn-skapinum, sum skal fylgja við sjálvuppgávuni. Um tann upprunaliga útveganarupphæddin er hægri enn 150.000 kr., kann heldur ikki verða avskrivað uppá útreiðslur til ábøtur, sum eisini skulu førast á tann serstaka aktivpostin.

Tær avskrivingar, sum verða gjørdar av útveganarvirðinum upp til 150.000 kr, verða býttar sum higartil eftir lutfallinum millum privatu og vinnuligu nýtsluna av rakstrargagninum umræddu inntøkuár. Bert tann parturin, sum svarar til vinnuligu nýtsluna av rakstrargagninum, kann dragast frá.

§ 8, 2. stk. avmarkar møguleikan fyri at draga tap frá við sølu av blandaðum rakstrargøgnum, hvar útveganarvirðið er hægri enn 150.000 kr. Henda

avmarking svarar til tað, sum er umrøtt frammanfyri í § 5 a um persónbilar. Tá ið tað í flestu førum snýr seg um bilar, sum verða nýttir bæði vinnuliga og privat, kann henda regla best lýsast við trimum dømum.

Dømi: Ein bilur, sum ánarin nýtir bæði vinnuliga og privat, verður keyptur í apríl 1987 fyri 200.000 kr. Hann verður eins og í § 5 a býttur upp í ein avskrivingarbæran part (I) og ein ikki avskrivingarbæran part (II).

Dømi I:	I.	II.
Útveganarprísur 1987	kr. 150.000	50.000
Avskriving 1987 30%	kr. 45.000	
Saldo	kr. 105.000	
Vinnuligi parturin av bilnýtsluni í 1987 er 50%, soleiðis at 22.500 kr. kunnu dragast frá skattskyldugu inntøkuni í 1987.		
Ábøtur á bilin í 1988		5.000
Avskriving 1988 30%, ½ vinnulig nýtsla = 10.500 kr.	kr. 31.500	
Ikki avskrivaða upphæddin (I+II)	kr. 73.500	55.000
Søla í 1989		kr. 150.000
— ikki avskrivað (I+II)		kr. 128.500
Vinningur		kr. 21.500

Tær skattligu avskrivingarnar í 1987 og 1988 eru 22.500 kr. + 10.500 kr. = 33.000 kr. Samlaðu avskrivingarnar í 1987 og 1988 eru 150.000 kr. ÷ 73.500 kr. = 76.500 kr. Sum skattskyldug inntøka í 1989 verður roknað $\frac{33.000}{76.000}$ av vinninginum 21.500 kr., ella 9.274 kr.

Dømi 2:	
Bilurin seldur í 1989 fyri	kr. 120.000
— ikki avskrivað (I+II)	kr. 128.500
Tap	kr. 8.500

men tá ið tapið er minni enn 55.000 kr. (II), kann tað ikki verða drigið frá, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp.

Dømi 3:	
Bilurin seldur í 1989 fyri	kr. 50.000
ikki avskrivað (I+II)	kr. 128.000
Tap	kr. 78.500
herfrá verður drigið (II)	kr. 55.000
Restupphædd	kr. 23.500

sum kann verða drigin frá, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp við $\frac{33.000}{76.000}$ av 23.500 kr., ella 10.137 kr.

8) § *16 c*: Broytingin í hesi grein ber í sær, at persónur, sum hevur avskrivað av ognum, sum hann eigur **uttanlands**, skal rinda eitt avgjald uppá 40% av **hesum avskrivingum**, tá ið **full** skattskylda til Føroya endar.

Avgjaldið verður býtt við ⅓ til kommununa og ⅔a til landskassan.

Skotið verður upp, at landsstýrið kann áseta nærri reglur viðvíkjandi útinnanini av hesi lógarreglu.

9) Í **broyting 12)** verður **skotið** upp at seta nýggja § 17 a, sum loyvir skattligar avskrivingar av alibrúkum.

Sostatt er neyðugt at broyta yvirskriftina á 4. kap. frá »Bygningar« til: »Bygningar v.m.«

10) § *17, 1. stk.*: Við hesi broyting er eitt nú gjørd ein nágreining av galdandi mannagongd, nevniliga at neyðug skrivstovu- og goymsluhøli, sum hoyra til teir bygningar, sum nevndir eru í § 17, 1. stk., eisini kunnu avskrivast skattligu.

11) § *17, 2. stk.*: Broytingin er ein nágreining av verandi mannagongd.

12) § *17 a*: Núverandi orðing av avskrivingarlógini ber í sær, at munur verður gjørdur á fiskaalarum, hvat møguleikanum fyri skattligum avskrivingum viðvíkur.

Alarar, sum nýta aliringar, kunnu gera skattligar avskrivingar av hesum eftir kap. 1 í avskrivingarlógini, tá ið aliringar kunnu verða roknaðir sum rakstrargøgn, meðan alarar, sum ístaðin gera grótkast v.m., hava ikki møguleika fyri at gera skattligar avskrivingar av hesum, hóast peningaligu fløgurnar í hesum fyri mangan eru stórri.

Fyri so væl sum gjørligt at siðustilla hesar alarar, verður skotið upp, at grótkast v.m. til alibrúk, sum eru vinnulig burturav, kunnu avskrivast eftir somu reglum sum sokallaðir framleiðslubygningar, jbr. § 17, 1. stk., litra a.

Skotið verður upp, at reglurnar í hesi lóg, sum galda fyri nevndu bygningar, í øllum lutum eisini verða galdandi fyri hesi alibrúk.

13) § *20, 4. stk.*: Í alt størri mun verður sami bygningur nýttur samstundis til fleiri endamál, sum hvørt sær heimila avskriving eftir ymsum prosentsatsum.

Tá ið ivi kann standast um, við hvørjum prosenti avskrivast skal eftir, verður við hesum skotið upp at áseta reglur, sum siga, at tá ið ein bygningur samtíðis verður nýttur til vinnulig endamál, sum heimila avskriving bæði eftir litra a ella b og litra c í § 17, 1. stk., so skal eitt upplýtt gerast av útvegsnarvirðinum í sama lutfalli, gólvviddin í bygningunum verður nýtt til hvørt endamál sær. Avskrivast skal so av hvørjum lutfalsliga parti av útvegsnarvirðinum við teimum prosentum, sum galdandi eru fyri hvønn nýtsluháttin.

14)-15)

§ 25, 1. og 2. stk.: Broytingin er einans ein nágreining og staðfesting av

galdandi rætti, nevniliga at afturvunnar avskrivingar í sambandi við sølu ella avhending av bygningum ella byggigrundum, har bygningar stundar ella hava staðið, sum kundu verið avskrivaðir sambært § 17, 1. stk. í hesi lóg, skulu roknast við í skattskyldugu inntøkuna, hetta uttan mun til, um bygningar ella byggigrundir eru útvegað aðrenn ella aftan á 1. januar 1950.

16) *§ 29, 1. stk.:* er ein dagføring, so ávísingin á 1963-skattalógini verður strikað, og nýggj ávísing á samtíðarskattalógina verður sett ístaðin.

III. Løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum.

1) *§ 4, 4. punktum:* Broytingin hevur sum endamál at nágreina galdandi mannagongd, so tað greitt verður orðað í lógini, at hall í landsskattinum vegna rentufrádrátt kann verða drigið frá í landsskattinum 3 tey næstu árini.

2) *§ 7:* Talan er um eina útgreinan av verandi reglu á tann hátt, at tað nú verður álagt honum, sum rindar royalty, at halda aftur og rinda eitt avgjald uppá 25% av hesum til Føroya Gjaldstovu.

IV. Løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um fløgugrunnar.

Broytingin ber í sær, at tað við gildi frá 1. januar 1988 verður ikki loyvt at seta av til fløgugrunnar við tí endamáli at forskotsavskriva teir bygningar, sum nevndir eru í § 17, 1. stk., litra b og litra c í avskrivingarlógini.

Hinvegin verður framvegis loyvt at seta av til fløgugrunnar við tí endamáli at forskotsavskriva sokallaðar »framleiðslubygningar«.

V. Løgtingslóg nr. 51 frá 29. december 1971 um skatt av rentuvøggingum v.m. við seinni broytingum.

1) *§ 3a, 1. stk.:* er ein nágreining av, hvussu og nær pristalsviðgerðin av frádráttarloftinum fyri kapitalleiðirlønarskipan skal gerast.

2) *§ 6, litra b):* Broytingin ber í sær, at avgjaldsskyldan fevnir um øll innagjøld frá og við 29. mai 1985.

VI. Løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um innrokuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum.

1-4)

Broytingarnar bera í sær, at innistandandi peningur á føroyskari postgiro verður skattaður á sama hátt sum innistandandi peningur í føroyskum bankum og sparikassum.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. apríl 1987 og undir 1. viðgerð tann 7. apríl 1987 beint í skattanevndina.

Nevndin hevði fund 8. apríl 1987. Á hesum fundinum varð ynski sett fram um at hava umboð fyri Skrásetingareftirlitið, bankarnar og advokatarnar við á fund. Lógaruppskotið varð viðgjørt í sini heild. Nomið varð serliga við nýtsluna av p-talinum í sambandi við upplýsingarskylduna og tup uppá debitorar. Tað verður ikki on-line skipan millum bankarnar og Líkningarráðið.

8. apríl 1987 kom umboð fyri Fossbankan á fund. Hevði sum fyrrverandi medarbeiðari á Elektron sera gott innlit í skattaskipanina og hevði arbeitt við skrásetingarlógini, tá henda kom. Vildi verja p-talið og ivaðist í lógarheimildini. Stúrdi fyri, at upplýsingarnar fóru at verða nýttar til annað endamál, og at ov nógv fólk fingu atgongd til upplýsingarnar. Vildi siga avtaluna um at koyra skattin upp.

Ónøgdur við orðingina í pkt. 14 (§ 33, nr. 12).

Átaladi stuttu freistina til at viðgera málið.

Aftaná kom Petur Zachariassen, limur í Skrásetingareftirlitinum, á fund. Formaðurin var burturstaddur. Viðmerkti, at hann ikki var løgfrøðingur. Hansara meting er, at heimild er til staðar í § 9. 2. stk. í skrásetingarlógini til nýtslu av p-talinum sum skotið upp, bara tað er mótvegis skattavaldinum. Bankarnir mugu ikki nýta p-talið internt. Talan er neyvan um samkoyring.

9. apríl 1987 komu á fund umboð fyri Sjóvinnubankan, Føroya Banka og Føroya Sparikassa.

Peningastovnarnir vístu á, at teir fyri stuttum hava tingast við Líkningarráðið um ymisk skattamál. Teir vóru ti skakkir, tá uppskot um mál, sum tingast hevði verið um, knappliga lá á tingborði.

Teir átaladu, at eingin tíð er at viðgera málið bara nøkulunda nágreiniliga. Bóðu um at fáa í minsta lagi 14 dagar at viðgera málið.

Viðvíkjandi nýtsluni av p talinum, soleiðis sum skotið er upp, eru peningastovnarnir ikki fegnir um.

Serliga komu peningastovnarnir inn á nr. 14 í lógaruppskotinum viðvíkjandi avseting móti tapi.

Víst varð á reglur í bankalógini og reglur frá bankaeftirlitinum, sum áleggur peningastovnunum at avseta móti tapi. Peningastovnarnir vístu á mannagongdina viðvíkjandi avseting, ið er bygd á gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum kunda.

Eisini varð víst á, at tað kann ganga long tíð, frá avseting móti tapi fer fram, ella veruligt tap er farið fram, til ein juridiskt kann siga, at vissa er fingin fyri tapinum.

Peningastovnarnir førdu fram, at avseting móti tapi, í tann mun tað er gjørt, er avgerandi neyðugt við tí føroyska vinnulívsmynstrinum. Tí ber heldur ikki til at gera beinleiðis sammetingar við viðurskiftini í t.d. Danmark.

Umboð fyri Advokatfelagið, Jógvan P. Lassen, Kári Petersen og Bjørn á Heygum komu á fund.

Advokatfelagið átaladi eisini, at tað als ongar stundir høvdu verið at seta seg inn í uppskotið.

Generelt helt felagið, at uppskotið rættaretiskt ikki er serliga heppið, tí tað byggir á grundregluna, at øll eru lógarbróturar. Spurningur er, um skráseting, automatisk upplýsing um hvønn einkultan o.s.fr. ikki liggur á markinum fyri ti, ið er loyvt eftir grundlógini.

Annars vendi felagið sær serliga ímóti § 120a, sum nevnir advokatar millum stovnar, ið taka móti peningi og øðrum virðum at umsita. Hetta heldur felagið vera óheppið, tí advokatar í Føroyum vanliga ikki útinna slíkt virksemi, men hinvegin hava pening á klientkonto, hvar talan ikki er um umsiting av hesum slagi, og hvar advokatarnir hava tagnarskyldu. Í tann mun, advokatar útinna slíkt virksemi, koma teir undir »og onnur«.

Advokatfelagið vísti eisini á, at í besari og mongum øðrum lógum eru alt ov nógvar heimildir at fyriseta reglur við kunngerð. Hetta ger tað torført frammanundan at kunna seg um veruliga innihaldið.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Hilmar Kass og Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at tað verður samtykt við einstøkum broytingum, og setir fram soljóðandi

broytingaruppskot

til nr. I.

1) Stk. 14 verður orðað soleiðis:

»*14.* Sum nýggj § 33, nr. 12) verður sett:

»Tap uppá skuldarar, heruppí útláns og ábyrgdarskuldarar hjá peningastovnunum. Tapið kann dragast frá, tá tað er staðfest. Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri, hvussu henda regla skal fyrisitast, og kann í hesum reglum loyva fráviki frá regluni í 2. punktum, so loyvast kunnu avsetingar móti slíkum tapi.««

1) Stk. 14 formuleres således:

»*14.* Som ny § 33, nr. 12) indsættes:

»Tab på debitorer, herunder pengeinstitutters udlåns- og kautionsdebitorer. Tabet kan fradrages, når det er konstateret. Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser for, hvorledes denne bestemmelse skal administreres, og kan i disse bestemmelser tillade afvigelser fra bestemmelsen i 2. punktum, så henlæggelser til sådanne tab kan tillades.««

2) Í punkti 5 verða orðini »aðrar reglur« breytt til »öðrum reglum«.

4) Í punkti 32 verða orðini: »vekslarar, advokatar« strikað, og »o.o.« verður breytt til: »og onnur«.

5) Í punkti 33 verða hesar broytingar: orðini »vekslarar, advokatar« verða strikað, »v.m.« verður broytt til: »og onnur«, orðið »peningi« verður broytt til: »innláni«.

6) Í punkt 39 verða hesar broytingar: orðini »vekslarar, advokatar« verða strikað.

7) Í punkti 40 verða hesar broytingar: orðini »vekslarar, advokatar« verða strikað, orðini »oo.« verður broytt til: »og onnur«.

3) I punkt 7 indsættes efter ordene »opgjorte privatforbrug« »jfr. stk. 3«, og tilføjes: »til investeringsfond«.

4) I punkt 32 udgår ordene »vekselerere, advokater«.

5) I punkt 33 udgår ordene: »vekselerere, advokater«,

6) I punkt 39 udgår ordene: »vekselerere, advokater«, efter ordet »forsikringsselskaber« indsættes ordene: »og andre«,

7) I punkt 40 udgår ordene: »vekselerere, advokater«.

8) I punkt 59 affattes § 148 således: »Landsstyret kan, når forholdene i særlig grad taler derfor, således navnlig i trangstilfælde, eftergive eller nedsætte en efter § 147 fastsat tillægsskat såvel som de af Færøernes ligningsråd efter reglerne i nærværende kapitel fastsatte bøder og efterkrav. Forsåvidt angår de kommunen tilfaldende efterkrav, bøder eller tillægsskat, kan kommunen eftergive eller nedsætte disse.«

Broytingaruppskot

til nr. VI.

1) I punkt 3 udgår teksten til § 2. Som ny tekst indsættes: »pengeinstitut til: pengeinstitut og postgiro«.

Nevndin viðmerkir, at í viðmerkingunum pkt. 6) seinastu reglu er 12)-16) komið skeivt fyri, og skal hetta vera: 7)-11).

Meirilutin (Poul J. Olsen, Hilmar Kass og Heini O. Heinesen) mælir til, at kunngerð í sambandi við punkt 14, t.e. nýggj § 33, stk. 12 verður orðað soleiðis:

Frádráttur fyri tap uppá skuldarar:

Tap uppá skuldarar kann dugast frá í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni í tí árinum, vissa er fingin fyri, at peningurin er mistur.

Neyðug vissa fyri, at so er, kann fáast til vega við at gera eina veruliga og ítøkiliga roynd til at fáa peningin inn. Hetta kann m.a. gerast við at lata sakførara innheinta peningin, og úttøku vur til fánýtis vegna insolvens.

Í øðrum lagi verður sum meginregla góðtikið, at neyðug vissa fyri, at peningurin er mistur, fyriliggur, eitt nú tá ið skuldarin er farin á húsagang., í gjaldsteðg í insolventa likvidaditión, hevur fingið gjaldskipan, er insolventur og fer á uppboðssølu, er rýmdur av landinum ella annað líkt.

Eisini kann frádráttur verða gjørdur, tá kravið eftir einari ítøkiligari meting verður hildið at vera mist fult ella partvíst.

Tá serlig viðurskifti tala fyri tí, eitt nú tá talið á skuldarum er stórt, verður loyvt at gera eina prosentvísa avseting móti tapi uppá skuldaran.

Støddin á prosentvísu avsetingini skal í fyrsta lagi ásetast út frá teimum roknskaparligu royndunum hjá virkinum, hvat tapi uppá skuldarar viðvíkir undanfarin ár. Tó skulu munandi broytt búskaparviðurskifti hava ávirkan á ásetingina av prosentinum eins og broytt samanseting av viðskiftafólki, ella tá vavið av lánveitingini er munandi broytt.

Harumframt kunnu royndir, sum onnur samlík virki við somu karmum hava, hava ávirkan.

Tá ið eyðsýnligur áhugafelagsskapur er millum skuldara og ognara, er frádráttur einans loyvdur við loyvi líkningarvaldsins.

Hvat bankunum viðvíkir, mælir meirilutin landsstýrinum til í samarbeiði við bankarnar at áseta serligar reglur fyri avseting móti tapi uppá útláns- og ábyrgdarskuldarar fyri hesar.

Minnilutin (Agnar Nielsen og Jógvan Sundstein) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins. Sjálvt um uppskotið í einstøkum lutum, til dømis tá ið tað snýr seg um avskrivingar uppá alibrúk og innrættingar í leigaðum hølum, er til frama fyri vinnulívið, so er heildarinnihaldið í lógaruppskotinum til stóran skaða og ampa fyri samfelagið.

Størsta broyting, sum hetta lógaruppskotið ger á galdandi skipan, er reglan um, at allir peningastovnar við at nýta persóntalið skulu skráseta allar borgarar landsins og teirra rentur og útlán og innlán.

Øll vita, hvussu vandamikið amboð EDV-skipanir eru. Tær skrásetingar, sum gjørdar verða og latnar verða til aðrar skráir, kunnu skjótt fara viðari, við tað at tær kunnu koma inn á samtíðarskattaskipanina. Spurningurin, um henda skráseting er í stríð við skrásetingarlógina, er eisini reistur, men ikki avkláraður.

Kønir EDV-menn, umboð fyri peningastovnarar og advokatarnar hava eisini verið á fundi við skattanevndini og hava ávarað innliga móti at gjøgnumføra hesa nýggju skipan. Allir teir, sum nevndin hevði fund við, vístu á tað ólag, sum komið var á lóggávuarbeiðið, tá ið eitt slíkt mál sum hetta skuldi skundast

ígjøgnum uppá 3-4 dagar. Peningastovnarnir vístu til dømis á, at teir vóru nevndir á næstan hvørji síðu í lógaruppskotinum, men kortini hevði eingin frá landsstýrisins síðu orienterað teir um nakað sum helst viðvíkjandi nýggju reglunum. Á sama hátt gjørdu advokatarnir vart við hetta og við vandan í skrásetingarreglunum. Tann sera óhepna og átaluverda munnagongd, sum hendu samgongan hevur framt, og tað sera vánaliga arbeiðslag, sum hevur verið í tingarbeiðinum, við fáum tingfundum í 3 fjórðingsár og nú ting- og nevndarfundir bæði dag og nátt fyri at fáa tingsetuna endaða, hevur ført við sær, at nágreinilig gjøgnumgongd av lógaruppskotum, bæði hesum og fleiri øðrum, er gjørd heilt ómøgulig. Hetta arbeiðslag vísir, at landsstýrið og samgongan hava mist tamarhaldið á lóggávuarbeiðinum og prógvað sína manglandi evni til at stýra landinum.

Tá ið samstundis ein so ódemokratiskur arbeiðsháttur sum í hesum føri verður nýttur, heldur minnilutin, at tað er upp á tíðina, at landsstýrið leggur frá sær.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Vegna løgtingsins manglandi álit á sitandi landsstýrið verður álagt løgmanni at útskriva nýval við stytst møguligari tíðarfreist.

2. viðgerð. Broytingaruppskot til uppskot I samtykt við 17-0, uppskot I soleiðis broytt samtykt við 17-0 atkvøðum. Uppskotini II, III, IV og V samtykt við 18-0 atkvøðum. Broytingaruppskot til VI samtykt við 17-0 atkvøðum. Uppskot VI soleiðis broytt samtykt við 17-0 atkvøðum. Við 17-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 13. apríl. Atkvøðugreiðsla 14. apríl. Uppskot landsstýrisins við broytingum frá skattanevndini endaliga samtykt við 17-6 atkvøðum.

F.L. j.nr. 430-12-45-16. Lógirnar nr. 54, 55, 56, 57, 58 og 59 frá 8. mai 1987.

124 Ferðamannamiðstøðin

Ikki framlagt.

125 Landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur

Ár 1987, fríggjadagin 3. apríl legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af Kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini at veita móti borgan sum sjálvskuldari fyri borgarum, sum statskassin sambært lóg nr. 172 frá 24. mai 1955 § 1 veitir »Kreditforeningen af kommuner i Danmark«, tá felagið veitir lán til kommunur.

2. stk. Eisini er landsstýrinum heimilað saman við fíggjarnevndini at borga sum sjálvskuldari beinleiðis landskassans vegna fyri lán, sum felagið veitir kommunum.

§ 2. Løgtingslógin kemur í gildi, tá hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. mars 1988.

lagtingslov om landskassegaranti for lån fra Kreditforeningen af Kommuner i Danmark til færøske kommuner.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget at kontrakautionere som selvskyldner for kautioner, som statskassen jfr. lov nr. 172 af 24. maj 1955 § 1 yder Kreditforeningen af kommuner i Danmark, når foreningen yder lån til kommuner.

Stk. 2. Endvidere er landsstyret landskassens vegne sammen med finansudvalget bemyndiget at kautionere som selvskyldner direkte for lån, som foreninger yder kommuner.

§ 2. Lagtingsloven træder i kraft ved dens kundgørelse og træder ud af kraft 31. marts 1988.

Viðmerkingar:
Við løgtingslóg nr. 36 frá 10. apríl 1986 varð veitt landsstýrinum logmæti at borga fyri kommunukreditt.felagnum, men gekk henda heimild út 31. desembar 1986.

Sí um hetta mál løgtingsmál nr. 61/1985.

Landsstýrið umhugsar sum kunnugt at økja kommunala lánsgrunnin, men hóast hesin verður øktur, er hann ov lítil í fyrstu atlogu.

Avgjørt er tí í landsstýrinum at skjóta upp fyri tinginum at leingja lógina um borgan fyri lánum úr kommunukreditt.felagnum.

Í 1986 vórðu veittar hesar broganartilsagnir eftir lógini:

Nólsoyar kommuna	kr.	1.543.000
Oyndarfjarðar kommuna	kr.	6.700.000
Nes kommuna	kr.	3.500.000
Hósvíkar kommunu	kr.	2.500.000
Runavíkar kommuna	kr.	16.348.000
Tvøroyrar kommuna	kr.	29.241.000
Tórshavnar kommuna	kr.	42.500.000
Fuglafjarðar kommuna	kr.	27.545.000
Mikladals kommuna	kr.	1.136.000
	kr.	131.016.000

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum og undir fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið.

Undir viðgerðini varð spurningurin reistur, um landskassin veðheldur fyri brutto- ella nettoupphæddini.

Fíggjarnevndin er samd um, at upphæddir, sum veðhildið verður fyri, skulu vera bruttoupphæddir.

Við hesi viðmerking mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 28-0 atkvøðum, § 2 útlan atkvøðugreiðslu. Við 28-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 27-1 atkvøðum.

F.L. j.nr. 809-52-9. Lóg nr. 24 frá 30. apríl 1987.

126 Broyting í landsbankalógini

Ár 1987, fríggjadagin 3. apríl legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 14. mai 1986, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 4, 2. stk., verða »15 limir« broytt til: »9 limir«.
2. Í § 4, 2. stk., litra a) verða »4 limir« broytt til: »3 limir«.
3. Í § 4, 2. stk., litra c) verða í báðum førum »9 limir« broytt til: »4 limir«.
4. Í § 4, 2. stk., litra d) verður »2 ár« broytt til: »1 ár«.
5. Í § 4, 3. stk., verður »7 limir« broytt til: »5 limir«.
6. Í § 4, 3. stk., litra b) verður í báðum førum »5 limir/nir« broytt til: »3 limir/nir«.
7. Í § 11, 2. stk., verður »5 limir« broytt til: »3 limir«.

§ *2.*

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om Landsbanki Føroya.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 57 af 2. oktober 1978 om Landsbanki Føroya, som ændret ved lagtingslov nr. 52 af 14. maj 1986, foretages følgende ændringer:

1. I § 4, stk. 2, ændres »15 medlemmer« til: »9 medlemmer«.
2. I § 4, stk. 2, litra a) ændres »4 medlemmer« til: »3 medlemmer«.
3. I § 4, stk. 2, litra c) ændres i begge tilfælde »9 medlemmer« til: »4 medlemmer«.
4. I § 4, stk. 2, litra d) ændres »2 årig« til: »1 årig«.
5. I § 4, stk. 3, ændres »7 medlemmer« til: »5 medlemmer«.
6. I § 4, stk. 3, litra b) ændres »5 medlemmer« til: »3 medlemmer«.
7. I § 11, stk. 2, ændres »5 medlemmer« til: »3 medlemmer«.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar til broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya:

Danska nationalbankalógin ásetir, at Nationalbankin skal hava eitt umboðsmannaráð við 25 limum og eina nevnd við 7 limum.

Tá tann føroyska landsbankalógin varð gjørd í 1978, varð við donsku lógini í huganum ásett, at landsbankin skal hava eitt umsjónarráð við 15 limum og eina

nevnd við 7 limum. Hóast umsjónarráðið er minni enn tað danska, so nú tó framvegis haldast, at 15 ávikavist 7 limir er heldur nógv, tá hugsað verður um støddina av tí føroyska búskapinum. Eitt minni limatal ger eisini, at arbeiðsumstøðurnar verða bøttar.

Tí skjýtur landsstýrið upp, at umsjónarráðið og nevndin verða minkað niður í ávikavist 9 og 5 limir. Landsstýrið metir, at teir báðir limirnir, ið umboða ávikavist búskaparliga og løgfrøðiliga sakkunnleikan, framvegis skulu sita í bæði umsjónarráði og nevnd. Tí verður tað talið av hinum umboðunum, ið má minkast.

Rættingin í § 11, 2. stk., stendst av, at limatalið í nevndini er minkað.

Umframt hesar broytingar verður skotið upp at broyta § 4, 2. stk., litra d), so formansskapurin í umsjónarráðnum kemur at sita 1 ár í senn í staðin fyri sum nú í 2 ár. Orsøkin til hesa broyting er teknisk: samsvar er ikki millum tey 5 árini, sum umsjónarráðið verður valt fyri, og tey 2 árini, formansskapurin situr.

Teir 9 limirnir at umboða vinnufeløg í umsjónarráði Landsbankans verða nú valdir av hesum feløgum, samanber kunngerð nr. 59 frá 23. juli 1979:

a. 2 valdir í felag av:
(1) arbeiðarafeløgunum
(2) handverkarafeløgunum
(3) starvsmannafeløgunum
(4) Lænastumannafeløgunum

b. valdir í felag av:
(1) Føroya Fiskimannafelag
(2) Meginfelag Útróðrarmanna
(3) Føroya Skipara- og Navigatørfelag
(4) Føroya Maskinmeistarafelag
(5) Føroya Motorpassarafelag

c. 2 valdir í felag av:
(1) Føroya Arbeiðsgevarafelag
(2) Føroya Handverksmeistarafelag
(3) Føroya Reiðarafelag
(4) Føroya Ídnaðarfelag

d. 1 valdur í felag av:
(1) Føroya Bóndafelag
(2) Føroya Búnaðarfelag
(3) Føroya Traðarmannafelag

e. 2 valdir í felag av:
(1) Føroya Detailhandlarafelag
(2) Føroya Heilsølumannafelag
(3) Føroya Keypsamtøka
(4) Bankunum og sparikøssunum
(5) Tryggingarfeløgunum

Eftir uppskotinum verða teir 4 limirnir at umboða vinnufeløg í umsjónarráði Landsbankans valdir soleiðis:

a. 1 valdur í felag av:
(1) arbeiðarafeløgunum
(2) handverkarafeløgunum
(3) starvsmannafeløgunum
(4) tænastumannafeløgunum

b. 1 valdur í felag av:
(1) Føroya Fiskimannafelag
(2) Meginfelag Útróðrarmanna
(3) Føroya Skipara- og navigatørfelag
(4) Føroya Maskinmeistarafelag
(5) Føroya Motorpassarafelag

c. 1 valdur í felag av:
(1) Føroya Arbeiðsgevarafelag
(2) Føroya Handverksmeistarafelag
(3) Føroya Reiðarafelag
(4) Føroya Ídnaðarfelag
(5) Føroya Bóndafelag
(6) Føroya Búnaðarfelag
(7) Føroya Traðarmannafelag

d. 1 valdur í felag av:
(1) Føroya Detailhandlarafelag
(2) Føroya Heilsølumannafelag
(3) Føroya Keypsamtøka
(4) Bankunum og sparikassunum
(5) Tryggingarteløgunum

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 14. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. apríl 1987. Við 1. viðgerð 7. apríl varð málið beint í rættarnevndina.

Landsstýrið mælir til at lækka talið á limum í umboðsráðnum úr 15 (sum eftir løgtingslógini frá 1978) niður í 9 limir. Haraftrat verður skotið upp, at formansskapurin í umsjónarráðnum skal sita í 1 ár í staðin fyri sum nú 2.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Hans J. Debes, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Dánjal P. Danielsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Eilif Samuelsen) mælir tinginum til at avtaka lógina um Landsbanka Føroya.

2. viðgerð 14. apríl, § 1 varð samtykt við 19-0 atkvøðum, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Við 19-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Lógin endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1400 9 1. Lóg nr. 30 frá 30. apríl 1987.

127 Løgtingslóg um íbúðagrunn

Ár 1987, mánadagin 6. aprít legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um íbúðagrunn.

Grunnurin.

§ *1.* Íbúðagrunnurin er sjálvognarstovnur, sum fyrisitin verður av stýrinum fyri Húsalánsgrunnin.

2. stk. Stovnsfæ grunsins er tann peningur, sum settur er í íbúðagrunn, stovnaður sambært lóg nr. 100 frá 1. december 1978, og árlig játtan á fíggjarløgtingslógini.

3. stk. Grunninum er heimilað at taka upp neyðug lán til fígging av íbúðahúsum. Við góðkenning landsstýrisins í hvørjum einstøkum føri kann grunnurin eisini taka upp uttanlandslán.

Endamál.

§ *2.* Endamál grunsins er at fremja og stuðla kommunum, feløgum og stovnum at útvega og reka íbúðahús.

2. stk. Íbúðagrunnurin veitir lán til íbúðafeløg og íbúðastovnar, sum sambært hesi lóg eru góðkend til at fáa fígging úr íbúðagrunninum.

Feløg og stovnar.

§ *3.* Bert feløg, sum skipað eru sum sjálvognarstovnur ella lutafelag, kunnu góðkennast sambært hesi lóg.

lagtingslov om boligfond.

Fonden.

§ *1.* Boligfonden er selvejende institution, som bliver styret af bestyrelsen for boliglånefonden.

Stk. 2. Fondens grundfond er det beløb, som er afsat til boligfond, etableret i henhold til lov nr. 100 af 1. december 1978, og årlig bevilling på finanslagtingsloven.

Stk. 3. Fonden er bemyndiget til at optage de nødvendige lån til finansiering af boligerne. Med landsstyrets godkendelse i hvert enkelt tilfælde, kan fonden også optage udenlandske lån.

Formål.

§ *2.* Fondens formål er at støtte kommuner, selskaber og institutioner og få til veje og drive bolighuse.

Stk. 2. Boligfonden yder lån til boligforeninger og boliginstitutioner, som i henhold til denne lov er godkendt til at blive financieret fra boligfonden.

Foreninger og institutioner.

§ *3.* Kun foreninger, som er selvejende institutioner eller andelsforeninger, kan blive godkendt i henhold til denne

Íbúðagrunnurin ella kommunur kunnu sjálv seta á stovn tílík íbúðafeløg ella -stovnar.

2. stk. Endamál felagsins skal vera at útvega og reka íbúðahús. Í sjálvognarstovni hevur íbúðagrunnurin og/ella heimstaðarkommunan rætt at velja lin(ir) í nevndina.

3. stk. Viðtøkur og broytingar í viðtøkum hjá íbúðafeløgum skulu góðkennast av landsstýrinum eftir tilmæli frá viðkomandi kommunu. Landsstýrinum er heimilað at krevja broytingar í fyrr góðkendum viðtøkum.

4. stk. Í viðtøkunum skal vera sagt, hvussu verða skal við ognum hjá íbúðafeløgum og stovnum, um virksemið steðgar, ella felagið/stovnurin skal avtakast, og hvør myndugleiki er tann rætti at gera hetta. Góðkent felag/stovnur kann ikki avtakast uttan eftir ummæli frá avvarðandi kommunu og við samtykki frá landsstýrinum.

5. stk. Søla, avhending ella broyting av ognunum má ikki fara fram uttan samtykki landsstýrisins. Heldur ikki má ognin veðsetast uttan loyvi, undantikið upprunaligu prioriteringini við byggilániunum ella endaligu prioriteringini ella pantibræv til íbúðagrunnin. Hús bygd til leiguíbúðir kunnu seinni við góðkenning landsstýrisins verða sundurbýtt í eigaraíbúðir.

6. stk. Um sama felag/stovnur útvegar og rekur fleiri íbúðahúseindir, skal í viðtøkunum verða gjørt av, at hesar eru fíggjarliga óheftar sínamillum og mótvegis felagnum/stovninum. Tann einstaka deildin skal hava skeytið upp á ognina. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um sundurbýtið í deildir.

lov. Fonden eller kommunerne kan selv oprette sådanne boligforeninger eller institutioner.

Stk. 2. Foreningens formål skal være at tilvejebringe og drive bolighuse. I selvejende institution har boligfonden og/eller hjemstedskommunen ret til at vælge medlem(mer) i bestyrelsen.

Stk. 3. Foreningens eller institutionens vedtægter eller forandringer i vedtægterne skal godkendes i landsstyret efter indstilling fra vedrørende kommune. Landsstyret har hjemmel at kræve forandringer i godkendte vedtægter.

Stk. 4. Vedtægterne for boligforeningen og institutioner skal indeholde regler om, hvorledes ejendom skal deles, om aktiviteten standses eller foreningen/institutionen nedlægges, og hvilken myndighed har hjemmel at gøre dette. En godkendt forening eller institution kan ikke nedlægges uden efter indstilling fra vedkommende kommune og med samtykke fra landsstyret.

Stk. 5. Salg, afhændelser eller ændring af ejendom må ikke ske uden landsstyrets samtykke. Ejendommen må heller ikke pantsættes uden samtykke bortset fra den oprindelige prioritering med byggelån eller endelig prioritering eller pantebrev til boligfonden. Boligejendomme bygget til udlejning kan senere med landsstyrets godkendelse blive delt op i ejerboliger.

Stk. 6. Tilvejebringer og administrerer samme forening/institution flere boligenheder, skal der i vedtægterne være bestemt, at disse er økonomisk uafhængige af hinanden og af foreningen/institutionen. Den enkelte enhed

og í hvønn mun tær fíggjarliga skulu vera óheftar hvør av aðrari og av felagnum/stovninum.

7. stk. Landsstýrinum er heimilað at ásetа nærri reglur um viðtøkur felagsins/stovnsins, um roknskap, herundir avsetan í grunn, nýtslu av yvirskoti og framløgu og grannskoðan av roknskapi.

8. stk. Landsstýrið kann avmarka upphæddina av ásettari nevndarsamsýning til nevndarlimir í feløgum og stovnum.

9. stk. Ikki er loyvt nevndarlimi í felagnum/stovninum at standa fyri ella fíggjarliga luttaka í ella at vera knýttur at sum ráðgevari ella einum virksemi ella keypi, sum felagið stendur fyri. Nevndarlimur í felagnum/stovninum kann ikki vera við í viðgerðini av máli, sum hann ella onkur, hann er nær skyldur við ella hevur serligt samband við, hevur serligan áhuga í.

10. stk. Landsstýrinum er heimilað at avmarka talið av góðkendum feløgum.

Stk. 6. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for fordelingen, og i hvor stor grad de enkelte dele skal være økonomisk uafhængige af hinanden og af foreningen/institutionen.

Stk. 7. Landsstyret har hjemmel at fastsætte nærmere regler for foreningens/institutionens vedtægter, om foreningens regnskab, herunder afhændelse i fond, benyttelse af overskud og fremlæggelse og revision af regnskab.

Stk. 8. Landsstyret kan begrænse beløbet af fastsat honorar til bestyrelsesmedlemmer.

Stk. 9. Det er ikke tilladt et bestyrelsesmedlem i foreningen/institutionen at forestår eller økonomisk deltage i eller være tilknyttet som rådgiver o.l. i et byggeri eller køb, som foreningen deltager i. Bestyrelsesmedlem kan ikke deltage i behandlingen af sager, som han eller nogen, han er nær beslægtet med eller særligt tilknyttet til, har en særlig interesse i.

Stk. 10. Landsstyret har hjemmel til at begrænse antallet af godkendte foreninger.

Útvegan og ætlanir:

§ *4.* Áðrenn farið verður undir bygging ella keyp, skal landsstýrið góðkenna byggiætlanir, stødd av íbúðum, kostnaðaræltlan, fíggingaræltlan v.m.

2. stk. Eingi keyp má gerast ella arbeiði byrjast, fyrr enn góðkenning fyriliggur.

3. stk. Landsstýrið tekur eftir tilmæli frá viðkomandi kommunu og íbúðagrunninum endaliga avgerð um góð-

Tilvejebringelser og projekter:

§ *4.* Før påbegyndelse af byggeri eller køb skal landsstyret godkende byggeplanerne, størrelse af boliger, prisoverslag, budget m.m.

Stk. 2. Køb eller arbejde må ikke påbegyndes, før godkendelse foreligger.

Stk. 3. Landsstyret tager efter indstilling fra vedkommende kommune og boligfonden endelig afgørelse om

kenning av íbúðafelag/støvni og góðkenning av ætlanum tess, jvbr. § 4, stk 1. Landsstýrið er tó ikki bundið av tilmælinum frá kommununi og/ella íbúðagrunninum.

§ 5. Í sambandi við lánveitingar úr grunninum skal verða strembað ímóti at útvega íbúðir so ódýrt sum gjørligt, samstundis sum íbúðirnar skulu hava teir neyðugu hentleikarnar. Íbúðirnar skulu í mesta lagi vera 100 m² stórar, tó kunnu undantøk gerast í serstøkum førum.

2. stk. Íbúðagrunnurin veitir lán til bygging, keyp, umbygging, uppibygging ella nútíðargerð av íbúðahúsum við felagshentleikum umfram til keyp av grundstykki til framtíðarbygging.

3. stk. Fígging til íbúðahús fevnir eisini um hjallar, handilshøli, skrivstovuhøli, bilplass og aðrar felags hentleikar.

4. stk. Tøkar íbúðir skulu latast umsøkjarum, sum hava serligan tørv á tí, m.a. út frá teirra fíggjarligu umstøðum.

Leiguíbúðir.

§ 6. Í íbúðahúsum við leiguíbúðum verður gjørdur leigusáttmáli. Leigan skal ásetast soleiðis, at hvør einstøk deild hevur møguleika at bera sínar rakstrarútreiðslur, t.v.s. renting, avskriving, fyrisiting og viðlíkahald.

2. stk. Leigan verður ásett í mun til støddina av teimum einstøku íbúðunum, eins og gjald fyri felagshentleikar verður ásett eftir somu reglum.

3. stk. Leigan verður ásett, tá ið útveganarútreiðslurnar eru uppgjørdar og

godkendelse af boligforening/institution og godkendelse af disses planer, jfr. § 4, stk. 1. Landsstyret er dog ikke begrænset af kommunens og/eller boligfondens instilling.

§ 5. I forbindelse med långivelse fra fonden skal det tilstræbes at tilvejebringe boliger billigst muligt, samtidig med at boligerne skal indeholde de nødvendige indretninger. Boligerne må ikke være større end 100 m². Denne regel kan i særlige tilfælde fraviges.

Stk. 2. Boligfonden giver lån til byggeri, køb, ombygning, tilbygning eller modernisering af bolighuse med fælles faciliteter udover til køb af grundarealer til fremtidsbyggerier.

Stk. 3. Finansiering af bolighuse omfatter også udhuse, forretningslokaler, kontorlokaler, garager og andre fællesindretninger.

Stk. 4. Ledige boliger skal udlejes til ansøgere, der har et særligt behov, bl.a. deres økonomiske forhold taget i betragtning.

Lejeboliger.

§ 6. I bolighus med boliger til leje udfærdiges lejeaftale. Lejen skal fastsættes således, at den enkelte afdeling har mulighed for at afholde sine egne driftsudgifter, d.v.s. forrentning, afskrivning, administration og vedligeholdelse.

Stk. 2. Lejen fastsættes i forhold til størrelsen af den enkelte bolig. Bidrag for fællesindretninger fastsættes efter samme regler.

Stk. 3. Lejen fastsættes, når byggeud-

endalig fígging fingin. Grunnurin skal góðkenna ásettu leigurna.

4. stk. Hækking av leigunni, um hetta gerst neyðugt, skal góðkennast av grunninum og skal fráboðast tríggjar mánaðir frammanundan skrivliga til hvønn einstakan leigara. Um leigan, orsakað av niðurgjalding av lánum ella avskriving, kann metast at vera órímiliga lág, kann hon við góðkenning grunsins setast hægri enn sambært 1. stk. Yvirskotið fer tá í grunn til umvælingar av húsunum ella til aðra íbúðaíløgu.

5. stk. Áðrenn leigari flytir inn í íbúð, skal sum innskot til eigaran gjaldast 3% av útveganarkostnaðinum í mun til støddina av íbúðini. Innskotið verður prístalsviðgjørt og afturgoldið leigaranum, tá flutt verður úr íbúðini, samanber tó 6. stk.

6. stk. Tá leigari flytur úr íbúð, rindar eigarin yvir raksturin kostnaðin av at mála og tapetsera íbúðina, um hetta gerst neyðugt. Aðrar umvælingar verða drignar frá innskotinum hjá leigaranum, áðrenn restin verður útgoldin.

gifterne er opgjort og den endelige finansiering er opnået. Fonden skal godkende den fastsatte leje.

Stk. 4. Såfremt det skulle være nødvendigt at forhøje lejen, skal fonden godkende dette, og skal forhøjelsen meddeles hver enkelt lejer skriftligt tre måneder forinden, såfremt lejen på grund af afbetaling på lån eller afskrivning bliver urimeligt lav, kan lejen med godkendelse fra fonden forhøjes uanset stk. 1. Overskuddet henlægges da i fond til istandsættelse af ejendommen eller andre investeringer i boligejendomme.

Stk. 5. Inden en lejer flytter ind i en bolig, skal han indbetale til fonden 3% af opførelsesudgifterne sat i forhold til boligens størrelse. Indskuddet prisregureres og tilbagebetales lejeren, når denne fraflytter boligen, jfr. dog stk. 6.

Stk. 6. Når lejeren fraflytter en bolig, afholder ejeren udgifterne ved at male og tapetsere boligen, såfremt dette skønnes nødvendigt. Andre reparationer fradrages indskuddet fra lejeren, før resten bliver udbetalt.

Eigaraíbúðir.

§ 7. Í íbúðahúsum við íbúðum, sum ætlaðar eru til sølu beinanveg ella seinni, skal í viðtøkunum frammanundan vera skilliga sagt frá hesum, einsog í viðtøkunum skal vera gjørt av, hvussu sølupeningurin skal nýtast, og um víðari søla kann fara fram og tá undir hvørjum treytum.

2. stk. Landsstýrið kann seta sum treyt fyri góðkenning av viðtøkunum, at íbúðirnar ikki verða seldar fyrr enn

Ejerboliger.

§ 7. I bolighuse med boliger, som efter planerne straks eller senere skal sælges, skal dette i forvejen klart fremgå af vedtægterne. Ligeledes skal det fremgå af vedtægterne, hvorledes salgsprisen skal bruges, og om videresalg skal være gyldigt, og da under hvilke forudsætninger.

Stk. 2. Landsstyret kan ved godkendelsen af vedtægterne for boligerne betinge, at disse ikke bliver solgt, før de

aftan á ávíst áramál sum leiguíbúðir.

Fígging og afturrindan.

§ 8. Til keyp ella bygging av íbúðarhúsum lænir grunnurin 18%, og felagið/stovnurin útvegar 18% av virðinum sum eginpening.

2. stk. Tey fyrstu 5 árini verður lánið úr íbúðagrunninum og eginpeningurin ikki roknaður uppí, tá leiguupphæddin verður ásett. Lánið og eginpeningurin verða síðani rindað aftur við 1/40 parti um árið og við rentu, ið svarar til 10% av tí til eina og hvørja tíð galdandi útlánsrentu hjá Húsalánsgrunninum. Verður íbúð latin sum eigaraíbúð, skal lánið úr íbúðagrunninum rindast aftur við somu treytum sum lán úr Húsalánsgrunninum. Eginpeningurin verður afturgoldin kontant.

3. stk. Lán úr íbúðagrunninum og eginpeningurin, ið verður nýttur til umbygging, uppibygging ella nútíðargerð, skal afturgjaldast yvir 20 ár við vanligu rentu grunsins.

4. stk. Fyri at halda eina rímiliga leigu verður helvtin av rentum av lánum, sum felagið/stovnurin tekur til bygging og keyp, ikki reknað við í leiguna tey fyrstu 5 árini, frá tí húsini eru liðugt bygd ella keypt. Til tann rentumun, ið soleiðis kemur fram, verður árliga veitt lán úr íbúðagrunninum. Hetta lán verður lagt afturat upprunaliga láninum úr íbúðagrunninum og verður afturgoldið eftir somu reglum sum hetta, jvbr. § 8, 2. stk.

5. stk. Lánini úr íbúðagrunninum verða veitt sum kontantlán. Lánini skulu hava upprykkjandi veðrætt, og bar fungera sum lejeboliger i en fastsat periode.

Finansiering og tilbagebetaling.

§ 8. Til køb eller opførelse af boligejendomme låner boligfonden 18%, og foreningen/institutionen tilvejebringer 18% af værdien som egenkapital.

Stk. 2. De første 5 år medregnes lånet fra boligfonden og egenkapitalen ikke ved fastsættelsen af lejen. Lejerne betaler herefter lånet og egenkapitalen tilbage med 1/40 del om året og med en rente, der svarer til 10% af den til enhver tid gældende udlånsrente i boliglånefonden. Såfremt en overtager lejligheden som ejerlejlighed, skal den omhandlende del af egenkapitalen tilbagebetales på de betingelser, der gælder for lån fra boliglånefonden. Egenkapitalen tilbagebetales kontant.

Stk. 3. Lån fra boligfonden og egenkapital, som bliver brugt til ombygning, tilbygning eller modernisering, skal tilbagebetales over 20 år til fondens almindelige rente.

Stk. 4. Med det formål at holde en rimelig leje bliver halvdelen af renterne af lånet, som foreningen/institutionen optager til nybyggeri, ikke medregnet i fastsættelsen af lejen de første 5 år, efter at boligen er færdigbygget. Til dækning af den renteforskel, der fremkommer, bliver optaget lån i boligfonden. Dette lån bliver medregnet i det oprindelige lån fra boligfonden og bliver tilbagebetalt efter samme betingelser som dette jfr. § 8, stk. 2.

Stk. 5. Lånene fra boligfonden bliver ydet som et kontantlån. Lånene skal have oprykkende panteret, og skal be-

skulu upphæddirnar saman við frammanfyri verandi veðrættum liggja innan fyri metingarvirðið. Metingarvirðið er at skilja sum virði, mett av metingarmonnum Húsalánsgrunsins.

løbene med de foranstående panteretligheder ligge indenfor vurderingsværdien. Vurderingsværdien skal foreslås som værdien fastsat af boliglånefondens vurderingsmænd.

Roknskapir og grannskoðan.

§ 9. Roknskapirnir hjá íbúðagrunninum og teimum einstøku deildunum verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara, sum saman við viðmerkingum sendir landsstýrinum og løgtinginum roknskapirnar. Roknskaparárið er almanakkaárið.

Regnskab og revision.

§ 9. Boligfondens regnskaber og de enkelte afdelingers revideres af statsautoriserede revisorer, der tilsendes landsstyret og lagtinget med bemærkninger. Regnskabsåret er kalenderåret.

§ *10.* Grunnurin er leystur av øllum skatti til land og kommunu.

§ *10.* Fonden er fritaget for en hver skat til land og kommune.

Gildi.

§ *11.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin, og fer samstundis úr gildi løgtingslóg nr. 100 frá 1. december 1978 um íbúðagrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 11. mai 1982.

2. stk. Landsstýrið ger av, hvussu vera skal við umsitingini av teimum ognum, sum íbúðagrunnurin hevur útvegað sær eftir lóg nr. 100 frá 1. december 1978 sum broytt í 1982.

Gyldighed.

§ *11.* Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 100 af 1. december 1978 om boligfond, som ændret ved lagtingslov nr. 66 af 11. maj 1982.

Stk. 2. Landsstyret bestemmer, hvorledes de ejendomme, som boligfonden har anskaffet efter lov nr. 100 af 1. december 1978, som ændret ved lov nr. 66 af 11. maj 1982, skal administreres.

Viðmerkingar:

Tað, at fáa íbúðagrunnin at virka, var ein av málsetningunum hjá sitandi landsstýri, tá talan er um íbúðamál.

Íbúðagrunnurin varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 100 frá 1. december 1978. Trý ár seinni — í 1982 — kundi tásitandi landsstýri ásanna, at íbúðagrunnurin ikki hevði virkað, og út frá hesum varð lógin um íbúðagrunnin broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 11. mai 1982.

Í upprunalógini frá 1978 varð ásett, at íbúðagrunnurin skuldi hava egið stýri og egna stjórn og fyrisiting. Í 1982 var enn einki stýri valt, eingin stjórn sett og

eingin fyrisiting skipað, og ein av broytingunum í 1982 varð tí, at íbúðagrunnurin skuldi fyrisitast av stýrinum fyri Húsalánsgruntin.

Hóast broytingarnar í 1982 kunnu vit enn í dag siga okkum, at íbúðagrunnurin framvegis ikki er farin at virka eftir ætlan. Sitandi landsstýri hevur mett, at tað eru tvær meginorsøkir til, at grunnurin ikki virkar. Onnur er, at meðan íbúðagrunnurin og avvarðandi kommuna skulu skjóta hvør sínt 18% inn sum eginpening, so er tað íbúðagrunnurin einsamallur, ið kemur at standa sum eigari. Hin er, at lógin ásetir, at leigari, eftir at fimm ár eru liðin, annaðhvørt skal keypa íbúðina ella flyta út.

Á fundi tann 30. januar 1986 samtykti landsstýrið at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða lógina um íbúðagrunn, t.v.s. løgtingslóg nr. 100 frá 1. december 1978, sum broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 11. mai 1982. At umboða landsstýrið í arbeiðsbólkinum vórðu vald: Jóannes Dalsgarð, Turið Debes Hentze og Súsanna Danielsen. Sølja í Ólavstovu varð vald at umboða Føroya Ungdómsráð, meðan Jógvan við Keldu og Gunnar Hoydal vórðu valdir at umboða ávikavist Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunu.

Í einum álitti til landsstýrið sigur arbeiðsbólkurin:

»Bólkurin skipaði seg við Jóannesi Dalsgarð sum formanni og hevur havt 8 fundir. Verandi lóg og upprunalógin eru kannaðar saman við teimum viðmerkingum, ið tá vórðu gjørdar, og hevur bólkurin síðani umrøtt tær umstøður, sum hava gjørt, at lógin ikki hevur virkað eftir ætlan. Í hesum sambandi er serliga at viðmerkja, at hvørki grunnurin ella nøkur kommuna er farin undir at byggja íbúðahús og soleiðis nýta teir møguleikar, sum lógin gevur. Grunnurin hevur tó í samarbeiði við felag keypt 2 hús, sbrt. § 19 í verandi lóg.

Bólkurin heldur, at serliga tríggjar grundir eru fyri hesum:

1. Tá lógin av fyrstan tíð varð sett á stovn, varð ongantíð valt stýri ella stjórn, sostatt hendi einki, men kom onkur fyrispurningur til Húsalánsgrunnin.

   Í mai 1982 verður lógin broytt soleiðis, at grunnurin verður fyrisitin av stýrinum fyri Húsalánsgrunnin.

   Hetta var ein roynd at fáa grunnin til verka, men Húsalánsgrunnurin hevði og hevur ikki havt tað neyðuga fólkið og tekniskar umstøður til at taka upp á seg tað umfatandi arbeiði, sum er at fyrireika og at standa fyri slíkum byggingum.
2. Kommunur, sum hava havt áhuga og umstøður at byggja sbrt. lógini, hava aftrað seg, av tí at tað í lógini er ásett, at grunnurin einsamallur skal eiga íbúðahúsini, sjálvt um kommunan skal lata eins nógv til eginpeningin.
3. Stórur ivi hevur verið um ásetingina í lógini, sum sigur, at leigari kann í mesta lagi hava eina íbúð í 5 ár. Er talan um íbúðir, sum t.d. eldraíbúðir, vardar íbúðir og ungdómsíbúðir, hvussu skal tá verða við leigaranum, tá ið leigutíðin er úti.

Arbeiðsbólkurin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Jóannes Dalsgarð, Súsanna Danielsen, Turið Debes Hentze, Sølja í Ólavstovu og

Gunnar Hoydal) hevur við hesum ivamálum í huga skotið upp at umskipa lógina, tó so at hon heldur seg so tæt til galdandi lógina sum gjørligt, og er meirilutin samdur um at leggja fram hjálagda uppskot.

Meirilutin viðmerkir serliga, at sambært uppskotinum verður grunnurin nú fyrst og fremst stovnur, ið skal stuðla og veita lán til at útvega íbúðir, meðan tað verða góðkend íbúðafeløg og íbúðastovnar, ið skulu standa fyri, fremja og eiga íbúðabyggingina ella íbúðahúsini. Tí er settur ein nýggjur partur í lógina, sum umtalar hesi feløg og stovnar og setir tær treytir, ið tey skulu lúka fyri at verða góðkend.

Tó er møguleiki í verandi lógini varðveittur, at grunnurin sjálvur ella ein kommuna ella bæði í felag standa fyri bygging ella keypi av íbúðahúsum, men skulu tey tá stovna íbúðafelag til hetta endamál.

Endamálsgreinin fyri grunnin er tí broytt samsvarandi hesum.

Meirilutin heldur, at hetta er greiðari skipan, ið varðveitir ætlanina í verandi lóg, samstundis sum hon gevur møguleika hjá øðrum at útvega íbúðir, bæði vanligar íbúðir og íbúðir tit serstakan sosialan tørv.

Viðvíkjandi spurninginum um leiguíbúðir og eigaraíbúðir heldur meirilutin tað vera rættari at geva greiðar møguleikar fyri báðum, soleiðis at í viðtøkunum og í sambandi við góðkenning landsstýrisins er tikin støða frammanundan, hvat slag av íbúðum talan er um. Tó er í viðtøkunum framvegis møguleiki at áseta sum í verandi lóg, at íbúðirnar eru leiguíbúðir eitt avmarkað tíðarskeið og síðani skulu yvirtakast sum eigaraíbúð.

Annars er fíggjarmynstrið í høvuðsheitinum tað sama sum í verandi lóg, og eru yvirhøvur ordingar og ásetingar í verandi lóg varðveittar óbroyttar.

Miðað hevur verið ímóti at fáa sum mest við í lógina. Tað kann tó koma upp á tal at gera eina kunngerð, har millum annað landsstýrið áleggur stýrinum uppgávur eftir hesi lóg.«

Landsstýrið hevur samtykt at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í arbeiðsbólkinum og leggur tí uppskot til nýggja lóg um íbúðagrunn fyri tingið. Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar í lógaruppskotinum eru hjálagdar.

Viðmerkingar til einstøku greinarnar í lógaruppskotinum

Við § 1

Íbúðagrunnurin er sjálvognarstovnur, sum fyrisitin verður av stýrinum fyri Húsalánsgrunnin. Hetta merkir, at tað til eina og hvørja tíð valda stýrið fyri Húsalánsgrunnin eisini er stýrið hjá íbúðagrunninum, og at somu reglur ti koma at galda fyri hetta stýrið eisini.

Við § 2

Dentur verður lagdur á, at figging úr íbúðagrunninum bert verður latin til

íbúðahús. Sum íbúðahús er at skilja íbúðabygningur við fleiri íbúðum, vanlig sethús býtt upp í íbúðir ella smærri rúm. Tað er ikki ein treyt, at íbúðirnar í íbúðabygninginum ella sethúsinum eru serstakt matrikulerandar. Kisini hús við vanligari sethúsastødd, sum nýtt verða sum felagsbústaður hjá fleiri, koma undir heitið íbúðahús. Bert er ein treyt, at húsið verður nýtt til fastan bústað hjá viðkomandi, jvbr. tó § 5, stk. 2 og 3.

ad § 3

Fígging úr íbúðagrunninum verður bert latin, um lántakarin er skipaður sum ein sjálvognarstovnur ella eitt lutafelag. Loyvi krevst ikki frá nøkrum myndugleika at gera ein sjálvognarstovn ella eitt lutafelag, men um hesin stovnur ella hetta felag skal hava lán úr íbúðagrunninum, so skulu viðtøkur stovnsins/felagsins góðkennast av landsstýrinum. Somuleiðis skal landsstýrið góðkenna byggiætlanir, kostnaðaretlan, figgingaretlan v.m.

Áðrenn landsstýrið tekur avgerð í málinum, skal viðkomandi kommuna og íbúðagrunnurin hava givið sítt ummæli, og verður her hugsað um, at viðkomandi kommuna og íbúðagrunnurin hvør sær og í felag geva málinum eina gjølliga viðgerð, áðrenn málið verður latið landsstýrinum til endaliga avgerð. Landsstýrið er tó ikki bundið av tilmælinum frá kommununi og/ella íbúðagrunninum.

Umframt at málið skal viðgerast eftir tilmæli frá íbúðagrunninum og heimstaðarkommununi, so hava hesi somu eisini rætt samboert lógini at vera umboðað í nevndini í teimum sjálvognarstovnum, sum góðkendir verða til at fáa fígging úr íbúðagrunninum.

Um ein kommuna til íbúðahúsbygging ynskir fígging úr íbúðagrunninum, verður hetta gjørt, við at stovnaður verður ein sjálvognarstovnur ella lutafelag, hvørs umboð øll eru vald av kommununi.

ad § 5

Lógin ásetir bert, at strembast skal ímóti at útvega íbúðir so ódýrt sum gjørligt, tó við neyðugum hentleikum. Avmarking er tó sett til, at íbúðirnar í mesta lagi skulu vera 100 m² stórar. Henda avmarking er at skilja sum ein avmarking av einari vanligari íbúð. Er tosan um, at fleiri fólk, uttan tó beinleiðis at hesi eru at rokna sum eitt húski, búgva t.d. í einum sethúsum við einum kamari til hvørt, men annars gera nýtslu av felagsrúmum sum køki, stovu o.a., so kemur hetta undir regluna um undantøk, sum kunnu gerast í serstøkum førum. Somuleiðis kann hugsast, at undantak kann gerast við íbúðum til rørslubrekað, um hetta verður hildið neyðugt.

ad § 6

Eigarin, sum er sjálvognarstovnurin ella lutafelagið, ger sáttmála við leigararnar og ásetir leiguupphæddina, sum tó skal góðkennast av íbúðagrunninum.

af § 7

Umframt at fylgja reglunum í lógini um eigaraíbúðir, so skulu viðtøkurnar hjá felagnum eisini skilliga frammanundan siga frá, at ætlanin er seinni at útstykkja íbúðirnar til eigaraíbúðir, og eigur tá eisini í viðtøkunum beinanvegin at verða sagt frá, undir hvørjum treytum víðari søla kann fara fram, t.d. við at víðari søla ikki kann fara fram uttan loyvi frá eigarunum innan ávist áramál. Somuleiðis kann landsstýrið eisini treyta góðkenningina av, at íbúðirnar heldur ikki í fyrstu syftu verða seldar innan ávíst áramál.

ad § 8

Fyri at fáa lán úr íbúðagrunninum krevst ein eginpeningur upp á 18%. Eginpeningin og lánið úr íbúðagrunninum umframt onnur lán, sum eru upptikin í sambandi við íbúðahúsið, skulu leigararnir rinda aftur. Fyri at tryggja, at leigan ikki verður ov høg, er ásett, at tey fyrstu 5 árini skal eginpeningurin og lánið úr íbúðagrunninum ikki roknast upp í leiguna. Herumframt sleppur leigarin undan helvtini av øðrum lánirentum, sum stovnurin hevur tikið til hesa íbúðabygging tey fyrstu 5 árini. Hesa rentu rindar íbúðagrunnurin sum lán, og verður hetta lán afturgoldið saman við ti upprunaliga láninum úr íbúðagrunninum eftir somu reglum sum hetta. Rentan av lánum í íbúðagrunninum er 10% av tí til eina og hvørja tíð galdandi útlánsrentu hjá Húsalánsgrunninum. Avdráttartíðin er 40 ár.

Íbúðagrunnurin kann eisini veita lán til umbygging, uppíbygging og nýmótansgerð. Tá slíkt lán skal veitast, verður hetta veitt sum eitt 18% lán, og skal eigarin tá útvega 18% í eginpeningi. Hetta lán skal afturgjaldast eftir vanligum reglum yvir 20 ár við vanligu rentu íbúðagrunsins.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit I

Málið er lagt fram hin 6. apríl 1987 av Føroya Landsstýri og eftir 1. viðgerð hin 8. apríl 1987 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi hin 9. apríl og er samd um, at hetta mál er ov rúgvusmikið at viðgera nú, beint áðrenn tingið fer heim, og setir ti soljóðandi

uppskot

til

samfyktar

Løgtingið setir almanna- og heilsunevndina til millumtinganevnd til tess at viðgera lógina um íbúðagrunn.

2. viðgerð 13. apríl. Málið varð aftur beint í almanna- og heilsunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit II

Tá hetta tingmál varð beint í nevnd, varð vantað at tingið skuldi í summarfrí tveir dagar seinni. Tí varð mælt til at gera almanna- og heilsunevndina til millumtinganevnd.

Tá tingið kortini ikki kundi gerast liðugt, er málið viðgjørt av nýggjum eftir áheitan frá nevndarformanninum.

Tá lógin um íbúðagrunn varð smíðað í 1978, var tað sjálvandi við tí fyri eyga, at hon skuldi bøta um íbúðastøðuna hjá fólki.

Í 1982 varð lógin broytt, og kortini má ásannast, at lógin framvegis ikki virkar.

Orsøkirnar til hetta verða bildnar tvinnar:

Onnur er, at meðan íbúðagrunnurin og avvarðandi kommuna skjóta hvør síni 18% inn sum eginpening, so er bert íbúðagrunnurin ognari.

Eisini áseglir lógin, at leigarin, tá fimm ár eru liðin, antin skal keypa íbúðina ella flyta út úr íbúðini.

Ein arbeiðsbólkur hevur endurskoðað lógina.

Eftir tilmæli frá hesum arbeiðsbólki skulu góðkend íbúðafeløg og íbúðastovnar standa fyri, fremja og eiga íbúðaognirnar ella íbúðahúsini.

Møguleiki er tó varðveittur fyri, at ein kommuna, grunnur ella bæði í felag standa fyri bygging ella keypi við teirri treyt, at tey tá stovna íbúðafelag.

Í viðmælinum verður eisini mælt til, at møguleikar verða fyri áhaldandi at vera leigari, og at kravið um keyp ikki er treytaleyst aftan á fimm ár.

Hetta skal tó vera greitt frammanundan í sambandi við góðkenning landsstýrisins.

Møguleikin fyri at keypa eina íbúð t.d. aftan á fimm ár er alsamt til staðar.

Landsstýrið tekur undir við tilmælinum frá meirilutanum í arbeiðsbólkinum og mælir tinginum til at gera tað sama.

Meirilutin (Jákup Lindenskov, Karin Kjølbro, Flemming Mikkelsen og Tordur Niclasen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at taka undir við tí.

Minnilutin (Dánjal Pauli Danielsen) tekur støðu í tingsalinum.

Framhaldandi 2. viðgerð 14. apríl. § 1 samtykt við 19-0 atkvøðum, §§ 2-11 samtyktar við 19-0 atkvøðum. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 19-0 atkvøðum.

3. viðgerð 14. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1426-13-1. Lóg nr. 52 frá 7. mai 1987.

128 Løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku

Ár 1987, 6. apríl legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku.

lagtingslov om dagpenge ved barsel og sygdom.

§ *1.* Kvinna, ið hevur átt, og sum kemur undir kapittul 6 í dagpeningalógini, tað er »Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel« nr. 644 frá 13. december 1978 við seinni broytingum, hevur rætt til eykadagpening eftir hesi løgtingslóg, og eykadagpeningurin er munurin ímillum hægsta dagpening sambært § 10, 3. stk. í dagpeningalógini og dagpeningin hjá kvinnuni eftir dagpeningalógini.

§ *1.* En kvinde, der har født, og som omfattes af kapitel 6 i dagpengeloven, det vil sige Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel nr. 644 af 13 december 1978 med senere ændringer, har ret til supplementsdagpenge ifølge denne lagtingslov, og supplementsdagpengene udgør forskellen mellem dagpengenes højeste beløb i henhold til dagpengelovens § 10, stk. 3 og den pågældende kvindes dagpenge i henhold til dagpengeloven.

§ *2.* Kvinna, ið hevur átt, og sum ikki kemur undir kapittul 6 í dagpeningalógini, hevur rætt til dagpening eftir hesi løgtingslóg í 24 vikur aftan á barnsburð, sí tó § 3, og hesin dagpeningurin er sama upphædd sum hægsti dagpeningur eftir § 10, 3. stk. í dagpeningalógini.

§ *2.* En kvinde, der har født, og som ikke omfattes af kapitel 6 i dagpengeloven, har ret til dagpenge efter denne lagtingslov i 24 uger efter fødselen, jævnfør dog § 3, og disse dagpenge udgør samme beløb som dagpengenes højeste beløb i henhold til § 10, stk. 3 i dagpengeloven.

§ *3.* Hjúnafelagi hjá kvinnu, ið hevur átt, hevur rætt til dagpening eftir hesi løgtingslóg í tvær vikur við somu upphædd sum kvinnan, og nýtir hann hendan rætt, verður dagpeningavikutalið hjá kvinnuni eftir § 2 sett úr 24 vikum niður í 22 vikur.

§ *3.* Ægtefællen til en kvinde, der har født, har ret til dagpenge efter denne lagtingslov i to uger med samme beløb som kvinden, og udnytter han denne ret, nedsættes kvindens dagpengeugetal ifølge § 2 fra 24 til 22 uger.

§ 4. Tá ið fólk, sum søkja um ættleiðing, taka imóti barninum, og teir myndugleikar, sum kanna ættleiðingarmøguleikarnar, taka ta avgerð, at annað av foreldrunum skal vera heima í sambandi við móttøkuna, verður móttøkudagurin at javnseta við barnsburð, soleiðis at kvinna í hjúnalagi verður at javnmeta við kvinnu, ið hevur átt, og maður í hjúnalagi við hjúnafelaga hjá kvinnu, ið hevur átt.

§ 4. Når adoptionsansøgere modtager barnet, og de adoptionsundersøgende myndigheder træffer afgørelse om, at en af forældrene skal være hjemme i forbindelsen med modtagelsen, sidestilles modtagelsesdagen med fødsel, således at gift kvinde sidestilles med en kvinde, der har født, og gift mand med ægtefællen til en kvinde, der har født.

§ 5. Aftaná at dagpeningur er veittur í 13 vikur sambært § 11, 2. stk. í dagpeningalógini, eigur løntakari, sum annars framhaldandi lýkur treytirnar í dagpeningalógini, rætt til dagpening eftir hesi løgtingslóg, tó í mesta lagi í tilsamans 20 vikur í einum 6 mánaða skeiði.

2. stk. Aftaná at dagpeningur er veittur í 13 vikur sambært § 12, 1. stk. í dagpeningalógini, eigur løntakari, sum fær fólka-, avlamis- ella einkjupensjón, og sum annars framhaldandi lýkur treytirnar í dagpeningalógini, rætt til dagpening eftir hesi løgtingslóg, tó í mesta lagi í tilsamans 20 vikur í einum 12 mánaða skeiði.

§ 5. Efter at der er ydet dagpenge i 13 uger i henhold til § 11, stk. 2 i dagpengeloven, har en lønmodtager, der iøvrigt fortsat opfylder betingelserne i dagpengeloven, ret til dagpenge efter denne lagtingslov, dog højst i tilsammen 20 uger i en 6 måneders periode.

Stk. 2. Efter at der er ydet dagpenge i 13 uger i henhold til § 12, stk. 1 i dagpengeloven, har en lønmodtager, der modtager folke-, invalide- eller enkepension, og som iøvrigt fortsat opfylder betingelserne i dagpengeloven, ret til dagpenge efter denne lagtingslov, dog højst i tilsammen 20 uger i en 12 måneders periode.

§ 6. Reglurnar í dagpeningalógini hava við neyðugum tillagingum samsvarandi gildi fyri dagpening og eykadagpening eftir hesi løgtingslóg.

2. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um fyrisitingina av hesi løgtingslóg.

§ 6. Reglerne i dagpengeloven har med de nødvendige lempelser tilsvarende gyldighed for dagpenge og supplementsdagpenge i henhold til denne lagtingslov.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om administration af denne lagtingslov.

§ 7. Útreiðslurnar til dagpening og eykadagpening eftir hesi løgtingslóg ber landskassin.

§ 7. Udgifterne til dagpenge og supplementsdagpenge i henhold til denne lagtingslov afholdes af landskassen.

§ 8. Henda løgtingslóg fær gildi 1. oktober 1987 og er fyri harnsburðir frá og við hesum degi.

2. stk. Fyri tíðarskeiðið til 30. juni 1988 er vikutalið í § 2 20 vikur, og vikutølini 24 og 22 í § 3 eru ávikavist 20 og 18.

3. stk. Fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober til 31. december 1987 er vikutalið fyri dagpening eftir § 1 20 vikur.

§ 8. Denne lagtingslov træder i kraft 1. oktober 1987 og omfatter fødsler fra og med denne dag.

Stk. 2. For perioden indtil 30. juni 1988 er ugetallet i § 2 20 uger, og ugetallene 24 og 22 i § 3 er henholdsvis 20 og 18.

Stk. 3. For perioden fra 1. oktober til 31. december 1987 er ugetallet for dagpenge ifølge § 1 20 uger.

Viðmerkingar:

3. partur av 16. grein í fráboðanini hjá ST um mannarættindi talar um familjuna sum ta náttúrligu og grundleggjandi eindina í samfelagnum.

Tá ið samgonguskjalið hjá núverandi landsstýrisflokkum varð undirskrivað í januar 1985, var ásannað, at familjan er hornasteinurin í samfelagnum, og at lóggávan má verja heimið.

Tað er sjálvsagt, at samgonguskjalið í tí sambandi nevnir barnsburðarfarloyvi við løn, har vit hava verið eftirbátur í mun til onnur norðurlond.

Við hesum uppskoti vil landsstýrið, at vit koma á hædd við og í høvuðsregluni enntá stíga fram um hini norðurlondini. Høvuðsreglan er, at allar kvinnur, ið eiga, fáa sama rætt til barnsburðarhvíld og fáa somu dagpeningaupphædd, annaðhvørt tey so hava stóra lønarinntøku, lítla ella als onga.

Tann heimaarbeiðandi fær við hesum uppskoti somu sømdir sum hon, ið arbeiðir úti.

Dentur er lagdur á at geva nýføðingum møguleikar at vera so nógv sum gjørligt saman við sínum, tí at hetta gevur tann tryggleika, eingin okkara kann vera fyriuttan, og eina barlast fyri lívið. Tað eru alt fleiri og fleiri, ið gera vart við, hvussu umráðandi tann fyrsta tíðin saman við mammuni og familjuni er fyri barnið.

Hetta uppskot um longda barnsburðarhvíld veitir mammuni nevnda møguleika, og í landsstýrinum verður eisini arbeitt við, hvussu vit á bestan hátt kunnu tryggja kvinnur móti uppsøgn á arbeiðsplássinum, hálvdagsstørv og rætt til at vera mamma fyri børn sín.

Landsstýrið heldur tað vera av eins stórum týdningi, at ættleidd børn koma upp í dagpeningaskipanina, og somuleiðis at hjúnafelagin fær møguleika til at vera við.

Eisini sjúkradagpeningatíðina heldur landsstýrið tað vera neyðugt at broyta, tí at núverandi 13 vikur (3 mánaðir) tykjast vera heldur stutt tíð og koma teimum illa við, ið einki kunnu fáa eftir forsorgarlógini.

Landsstýrið er vitandi um, at øll eru ikki tryggjað í eini sjúkradagpeninga-

skipan, og kannar møguleikan fyri, at hetta verður so, og vónar at koma í løgtingið við einum lógaruppskoti hesum viðvíkjandi innan alt ov langa tíð.

Hjálagda lógaruppskot miðar ímóti:

1) at kvinnur, sum eru ikki løntakarar, fáa sama rætt til barnsburðarhvíld við dagpeningi sum løntakarar,
2) at dagpeningur eftir barnsburð í hvørjum føri verður útgoldin við hægstu dagpeningaupphædd,
3) at ættleiðing verður javnmett við barnsburð,
4) at hjúnafelagi fær rætt til dagpening í 2 vikur,
5) at longsta dagpeningatíðin við sjúku verður longd frá 13 vikum til 20 vikur (5 mánaðir),
6) og at landskassin ber útreiðslurnar.

Semja er í blokkstuðulssamráðingunum fingin við ríkisstýrið um at broyta dagpeningalógina, soleiðis at barnsburðarhvíldin verður longd frá 8 vikum til 24 vikur. Fram til 1. juli 1988 verður tó bert talan um 20 vikur sbrt. uppskot landsstýrisins.

Tað er ætlan landsstýrisins at broyta dagpeningakunngerðina (kunngerð nr. 51 frá 26. juni 1979 um dagpening), soleiðis at § 2, 3. stk. í kunngerðini við heimild í § 1, 5. stk., í dagpeningalógini verður orðað soleiðis, at barnakona, sum sambært sáttmála, sið ella lóg eigur rætt til løn í sambandi við barnsburð í tíðarskeiði, sum er styttri enn 24 vikur, fær rætt til dagpening sambært hesi lóg fyri tað tíðarskeið, sum eftir er til 24 vikur.

Løgtingslógaruppskotið er bygt upp sum uppískoyti til galdandi dagpeningalóg »Lov nr. 644 af 13. december 1978 for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel« við nevndu ætlaðu broyting, og verður fyrisitingin av nýggju reglunum á sama hátt sum undir galdandi reglum.

Meirútreiðslurnar av uppskotinum um barnsburðarhvíld, sum eru meirútreiðslur hjá landskassanum, verða mettar til 21.400.000 kr. árliga við núverandi lønarlagi, tá ið talan er um leingjan til 24 vikur.

Hægsta dagpeningaupphædd er frá 1. apríl 1987: 2.205 kr. um vikuna.

Meirútreiðslur av uppskotinum í § 5 um leingjan av dagpeningatíðini í sambandi við sjúku kunnu ikki roknast út so gjølla, og tað er eisini trupult at meta um tær. Um tað verður lagt til grund, at títtleikin av sjúku í seinna tíðarskeiðinum (tær 7 vikurnar) er um helvtina av títtleikanum í fyrra tíðarskeiðinum, kunnu meirútreiðslurnar setast til o.u. 8 mió. kr. árliga.

Í nøkrum førum verður sum er veitt hjálp eftir forsorgarlógini til fólk, sum koma undir § 5. Roknast kann við, at sparingin her verður o.u. 4 mió. kr., harav landskassin eigur ¾ ella o.u. 3 mió. kr.

Meirútreiðslurnar, sum nevndar eru frammanfyri, kunnu setast upp soleiðis:

Barnsburðarhvíld í 20 vikur og sjúkradagpening

Leingjan av sjúkradagpeningaskeiði	8,0 mió. kr.
÷ sparing viðvíkjandi forsorgarhjálp	3,0 — —
Nettoútreiðsla av leingjan av sjúkradagpeningaskeiði	5,0 mió. kr.
Barnsburðarhvíld í 20 vikur	21,4 — —
Nettomeirútreiðslan av uppskotinum	26,4 mió. kr.

Barnsburðarhvíld í 24 vikur og sjúkrapening:

Leingjan av sjúkradagpeningaskeiði	8,0 mió. kr.
÷ sparing viðvíkjandi forsorgarhjálp	3,0 — —
Nettoútreiðsla av leingjan av sjúkradagpeningaskeiði	5,0 mió. kr.
Barnsburðarhvíld 24 vikur	28,1 — —
Nettomeirútreiðslan av uppskotinum	33,1 mió. kr.

Fyrisitingarútreiðslurnar hjá almannastovuni, sum uppskotið hevur við sær, kunnu metast til umleið 300.000 kr., heruppií lønarútreiðslur til 1 starvsfólk aftrat.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1: Í hesari grein er reglan tann, at barnakona eigur rætt til hægstu dagpeningaupphæddina og ikki bert í mun til løn undan barnsburð. Greinin tekur eisini tær barnakonur við, sum eru undir sjálvboðnu dagpeningaskipanini við hálvari dagpeningaupphædd. Tær fáa eisini rætt til hægstu dagpeningaupphæddina.

Til § 2: Greinin snýr seg um barnakonur, sum ikki eru løntakarar (og ikki eru í sjálvboðnu dagpeningaskipanini). Skotið verður upp, at tær koma at fáa hægstu dagpeningaupphædd í 24 vikur. (Til 30. juni 1988 tó 20 vikur sambært § 8, 2. stk.)

Til § 3: Skotið verður upp, at pápi at barni (maður hjá giftari barnakonu) skal hava rætt til dagpening fyri tvær vikur, móti at vikutalið hjá kvinnuni verður lækkað samsvarandi.

Til § 4: Skotið verður upp, at ættleiðing (adoptión) í øllum førum verður javnumett við barnsburð, bert treytað av, at ættleiðingarmyndugleikarnir krevja, at foreldur verða heima hjá barninum og ikki í vinnuligum arbeiði.

Til § 5: Hetta uppskotið er ikki um barnsburð, men um vanligan dagpening við sjúku og skaða.

Skotið verður upp, at longsta dagpeningatíðin verður longd frá 13 vikum til 20 vikur (um 5 mánaðir), men at reglurnar annars verða óbroyttar.

Til § 7: Roknast má við drúgvari tíð til at leggja til rættis fyrisiting og serliga at

gera forrit til telduviðgerð, og kann tí løgtingslógin ikki koma at galda fyrrenn 1. oktober 1987.

Í 2. stk. er ásett, at leingjanin av barnsburðarhvíldini verður gjørd so líðandi, t.v.s. til 20 vikur frá 1. oktober 1987 og til 24 vikur frá 1. juni 1988.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Tað er Føroya Landsstýri, sum hin 6. apríl hevur lagt málið fram, sum eftir 1. viðgerð hin 8. apríl varð beint í almanna- og heilsunevndina.

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, ið mælir løgtinginum til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 10. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 27-0 atkvøðum, §§ 2-8 samtyktar við 27-0. Við 28-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

F.L. j.nr. 1010-12-2-4. Lóg nr. 25 frá 30. apríl 1987.

129 Sjómannaløgtingslóg

Ár 1987, týsdagin 7. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um sjómenn.

Kapittul I

Inngangur

§ *1.* »Sjómaður« merkir í hesari lóg øll av teimum, sum reiðarin hevur sett til at gera skipsarbeiði umborð á skipi í sjónum, uttan skiparan.

§ 2. Fyri tey, sum sett eru av reiðaranum at gera annað arbeiði umborð enn skipsarbeiði, og fyri tey, sum sett eru umborð av øðrum enn reiðaranum, hava hesar reglur gildi:

1) § 4 um minsta aldur, læknakanning v.m.,
2) § 9 um rætt hjá barnakonum til at fara av og fara heim í,
3) § 19, 2. og 3. stk., um hýru, heimferð o.a., tá ið skipbrot hevur verið,
4) § 27 um umsorganarskyldu v.m.,
5) § 30, 5. stk., um yvirtøku landsins av útreiðslunum til røkt og heimferð hjá kynsjúkum ella tuberklasjúkum,
6) § 31 um gjald landsins av ávísum útreiðslum til sjúkan ella skaddan sjómann,

lagtingslov om somænd.

Kapitel I

Indledning

§ *1.* Udtrykket sømand omfatter i denne lov enhver person, bortset fra skibsføreren, der er ansat af rederen til udførelse af skibstjeneste om bord i et skib i søen.

§ 2. På personer, der er ansat af rederen til at udføre andet arbejde om bord en skibstjeneste, samt på personer, der er ansat om bord af andre end rederen, finder følgende bestemmelser anvendelse:

1) § 4 om mindstealder, lægeundersøgelse m.v.,
2) § 9 om ret til afsked og hjemrejse i tilfælde af graviditet,
3) § 19, stk. 2 og 3, om hyre, hjemrejse m.m. i tilfælde af skibets forlis m.v.
4) § 27 om omsorgspligt m.v.,
5) § 30, stk. 5, om landets overtagelse af udgifterne til pleje og hjemrejse i tilfælde af kønssygdom eller tuberkulose,
6) § 31 om landets dækning af visse udgifter til syg eller skadet sømand,

7) § 32 um skyldu skipsførarans at syrgja fyri jarðarferð v.m.,
8) § 34, 2. og 3. stk., um gjald landsins av útreiðslunum av jarðarferð,
9) § 51, 1. og 3. stk., um skylduna at gera eftir boðum og um skaðabøtur,
10) § 52 um verju móti vanlukkum og heilsuvanda,
11) § 53 um kost- og heilsuvánir,
12) § 55 um hvíld,
13)) § 57 um loyvi til viðføri,
14) § 58 um ognarlutir, sum liggja eftir umborð,
15) § 60 um maktráð,
16) § 61 um skyldur skipsførarans, um grovt brotsverk verður framt og
17) § 65, 1. stk., nr. 1, og 2. stk, um revsing fyri ávís misbrot.

2. stk. Føroya Landsstýri kann, eftir at tað hevur biðið um ummæli frá Sjóvinnuráðnum, áseta reglur um, at hesar tær reglur, sum nevndar eru í 1. stk., skulu hava gildi fyri matstovufólkið og annað fólk, sum sett er umborð á ferðamannaskipið at vera ferðafólkinum til handa.

3. stk. Tey, ið nevnd eru í 1. og 2. stk., skulu gera tað arbeiði, sum skiparin heldur vera neyðugt fyri trygd skipsins.

4. stk. Fyri tey, sum verða tikin umborð sambært § 68 í sjólógini, hevur 1. og 3. stk. gildi.

7) § 32 om skibsførerens pligt til at sørge for begravelse m.v.,
8) § 34, stk. 2 og 3, om landets dækning af udgifterne ved begravelse,
9) § 51, stk. 1 og 3, om pligten til at efterkomme ordrer og erstatte skade,
10) § 52 om værn mod ulykker og sundhedsfare,
11) § 53 om kost- og sundhedsforhold,
12) § 55 om hviletid,
13) § 57 om adgangen til at medtage gods m.v.
14) § 58 om ejendele, der efterlades om bord,
15) § 60 om magtmidler,
16) § 61 om skibsførerens pligter i tilfælde af en grovere forbrydelse og
17) § 65, stk. 1, nr. 1, og stk. 2, om straf for visse forseelser.

Stk. 2. Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra Søfartsrådet fastsætte regler om, at kun de bestemmelser, der er nævnt i stk. 1, skal anvendes på restaurationspersonale og andet personale, der er ansat i et passagerskib til betjening af passagererne.

Stk. 3. De personer, der er nævnt i stk. 1 og 2, skal udføre det arbejde, som skibsføreren finder nødvendigt for skibets sikkerhed.

Stk. 4. På personer, der medtages om bord i medfør af sølovens § 68, finder stk. 1 og 3 anvendelse.

Kapittul II

Starvsavtalan v.m.

1. Gildi og uppsøgn av starvsavtaluni

§ 3. Reiðarin skal stíla fyri, at skrivlig avtala um setanartreytirnar verður gjørd við sjómannin. Starvsavtalan skal verða sett í serligan hýruavtaluformála, og ger Føroya Landsstýri eftir ummæli frá sjóvinnuráðnum av um snið og innihald formálans.

2. stk. Skiparin kann vegna reiðaran biðja ta neyðugu manningina. 1. stk. hevur gildi fyri starvsavtalur, sum gjørdar eru av skiparanum. Áðrenn maskinmanningin verður sett, skal skiparin, tá tað er møguligt, fáa sær uppskot frá maskinstjóranum. Hann eigur eisini at leita sær ráð hjá ovasta stýrimanni um setan av deksmanning og við hovmeistaran um setan av hjálparfólki hjá honum.

3. stk. Í hýruavtaluni skal verða tilskilað:

1) tað starv, sum sjómaðurin er settur í,
2) tað, ið avtalað er um avfaringarstað ella um uppsagnarfreist,
3) avtalaða hýran og dagin, hon verður at rokna frá,
4) nær ið sjómaðurin tekur við starvi,
5) dagurin, starvsavtalan verður uppsøgd, og
6) nær ið sjómaðurin fer av.

4. stk. Fyri fiskiskip ger Føroya Landsstýri eftir tilmæli frá Sjóvinnuráðnum neyðug frávik frá reglunum í 3. stk. Er hýra eftir lønarsáttmála, so skal tilskilast, millum hvørjar starvsbólkar sáttmálin er gjørdur, og hvønn

Kapitel II

Tjenesteaftalen m.v.

1. Tjenesteaftalens indgåelse og opsigelse.

§ 3. Rederen skal sørge for, at der oprettes skriftlig aftale med sømanden om ansættelsesvilkårene. Tjenesteaftalen skal udfærdiges på en formular til hyrekontrakt, hvis form og indhold fastsættes af landsstyret efter indhentet udtalelse fra Søfartsrådet.

Stk. 2. Skibsføreren kan på rederens vegne ansætte det fornødne mandskab. Stk. 1 finder anvendelse på de tjenesteaftaler, der er indgået af skibsføreren. Forinden maskinmandskab ansættes, skal skibsføreren, hvor det er muligt, indhente forslag fra maskinchefen. Han bør endvidere rådføre sig med den øverste styrmand om ansættelse af dæksmandskab samt med hovmesteren om ansættelse af medhjælp for denne.

Stk. 3. I hyrekontrakten skal anføres:

1) den stilling, sømanden er antaget til,
2) hvad der er aftalt om fratrædelsessted eller opsigelsesfrist,
3) den aftalte hyre og dagen, fra hvilken den skal løbe,
4) tidspunktet for sømandens tiltræden af tjenesten,
5) dagen for opsigelse af tjenesteaftalen samt
6) tidspunktet for sømandens fratræden.

Stk. 4. For fiskeskibe foretager landsstyret efter indstilling fra Søfartsrådet de nødvendige undtagelser fra bestemmelserne i stk. 3. Betales hyre efter

part av manningini hann er galdandi fyri.

5. stk. Sjómaður, sum fer við skipi, skal hava siglingarbók ella, um ikki, tá mynstringarváttan. Bókin ella váttanin verður latin skipsførarunum og verður í hansara varðveitslu, so leingi sjómaðurin er í starvinum.

§ *4.* eingin undir 15 ára aldur má verða settur í arbeiði umborð. Til brúgvatænastu og maskintænastu skal tó eingin undir 16 ár verða settur.

2. stk. Eingin má fara í ella røkja starv umborð, fyrrenn hann við nóg góðum úrsliti hevur verið undir teirri læknakanning, sum kravd er til slíkt starv. Læknakanningin kostar sjómanninum einki. Føroya Landsstýri ásetir reglur um læknakanningar.

3. stk. Til verndar hjá sjómonnum undir 20 ára aldur kann Føroya Landsstýri víkja frá reglunum í §§ 5, 6, 7, 11, 19, 20, 27, 55 og 56.

§ *5.* Hvør parturin kann siga starvsavtaluna upp við 7 daga freist, uttan so at annað er avtalað. Styttri uppsagnarfreist fyri reiðaran enn fyri sjómannin kann ikki verða avtalað.

§ *6.* Er ikki annað avtalað um avfaringarhavn, kann starvsavtalan bert verða uppsøgd til at fara úr gildi í føroyskari havn, sum skipið kemur til. Tá sagt verður upp, kann, um ikki annað er avtalað bert verða farið av í havnum í Danmark og í Grønlandi, um sjómaðurin er búsitandi í Danmark ávikavist í Grønlandi.

overenskomst, skal der angives, mellem hvilke foreninger overenskomsten er indgået, samt hvilken del af mandskabet den gælder for.

Stk. 5. En sømand, der forhyres, skal være i besiddelse af søfartsbog, eller, i mangel deraf, af mønstringsbevis. Bogen eller beviset overgives til skibsføreren og holdes i forvaring af ham, så længe tjenesteforholdet varer.

§ *4.* Ingen under 15 år må anvendes til arbejde om bord. Til brovagt og maskintjeneste kan dog ingen under 16 år ansættes.

Stk. 2. Ingen må tiltræde eller gøre tjeneste om bord, før han med tilfredsstillende resultat har gennemgået den for sådan tjeneste foreskrevne lægeundersøgelse. Lægeundersøgelsen er gratis for sømanden. Landsstyret fastsætter regler om lægeundersøgelser.

Stk. 3. Til værn for søfarende under 20 år kan landsstyret fravige bestemmelserne i §§ 5, 6, 7, 11, 19, 20, 27, 55 og 56.

§ *5.* Hver af parterne kan opsige tjenesteaftalen med 7 dages varsel, medmindre andet følger af aftalen. Der kan ikke aftales kortere opsigelsesvarsel for rederen end for sømanden.

§ *6.* Er ikke andet aftalt om fratrædelseshavn, kan tjenesteaftalen kun opsiges til ophør i færøsk havn, som skibet anløber. Opsigelse kan dog, medmindre andet er aftalt, kun ske til fratrædelsen i havn i Danmark eller i Grønland, hvis sømanden har bopæl henholdsvis i Danmark eller i Grønland.

Stk. 2. Har sømanden ikke bopæl på

2. stk. Er sjómaðurin ikki búsitandi í Føroyum, ella er hann ikki hýraður í Føroyum, kann starvsavtalan eisini verða uppsøgd til at fara úr gildi í fremmandari havn, sum skipið kemur til, uttan so at bert verður komið til havnar í skjótum ørindum at bunkra ella seta sjúk ella skadd í land ella annars fyri trygd teirra umborð, skips og farms.

3. stk. Er sjómaður hýraður fyri ávísa tí, og tíðin gongur út, meðan skipið er í sigling, heldur hann fram í starvinum, til skipið kemur í havn. Starvið heldur tó ikki uppat í fremmandari havn, har stutt verður steðgað, sbr. 2. stk.

4. stk. Hevur sjómaðurin fingið hýru fyri ávísa tíð ella ávísa ferð, hava 1. og 2. stk. gildi, um sjómaðurin verður verandi í starvinum, eftir at tíðin er gingin út, ella ferðin er endað, um ikki nýggj avtala er gjørd um avfaringarhavn.

5. stk. Á fiskiskipum er starvssetanin galdandi ein túr í senn, tá túrur byrjar og endar í Føroyum, tá annað ikki er avtalað.

Færøerne, eller er han ikke forhyret på Færøerne, kan tjenesteuf talen ogsaa opsiges til ophør i fremmed havn, som skibet anløber, medmindre havnen alene anløbes kortvarigt for bunkring eller landsætning af syge eller skadede eller i øvrigt af hensyn til de ombordværendes, skibets eller ladningens sikkerhed.

Stk. 3. Er sømanden forhyret for bestemt tid, og tiden udløber, medens skibet er i søen, fortsætter tjenesteforholdet, indtil skibet kommer til havn. Tjenesteforholdet ophører dog ikke i fremmed havn, hvor der gøres kortvarigt ophold, jfr. stk. 2.

Stk. 4. Er sømanden forhyret for bestemt tid eller bestemt rejse, finder stk. 1 og 2 anvendelse, hvis sømanden er forblevet i tjenesten, efter at tiden er udløbet, eller rejsen er endt, uden at ny aftale om fratrædelseshavn er indgået.

Stk. 5. På fiskeskibe er ansættelsen gældende for en tur ad gangen, hvis turen begynder eller slutter på Færøerne, og intet andet er aftalt.

§ 7. Sjómaður, sum hevur verið í tænastu umborð á sama skipi ella á skipum hjá sama reiðara í 6 mánaðir, og sum hevur biðið um avloysing ella sagt seg úr starvi við 4 vikurs freist ella, um styttri freist er avtalað, tá við teirri freistini, kann uttan mun til øðrvísi avtalu fara av í eini og hvørjari havn, skipið kemur í. Avfaring er tó ikki loyvd, tá ið steðgurin er stuttur, sbr. § 6, 2. stk.

§ 7. En sømand, der har gjort tjeneste på samme skib eller på skibe tilhørende samme reder i 6 måneder, og som har opsagt tjenesteforholdet med 4 ugers varsel eller, hvis kortere varsel er aftalt, da med dette varsel, kan uanset modstående aftale fratræde i enhver havn, skibet anløber. Fratrædelse kan dog ikke ske i fremmed havn, hvor der gøres kortvarigt ophold, jfr. § 6, stk. 2.

§ 8. Sjómaður, sum hevur bústað í Før-

§ 8. En sømand, der har bopæl på Færø-

oyum, og sum teir triggjar seinastu mánaðirnar ikki hevur havt møgu leika at fara av í føroyskari havn, hevur rætt til fría ferð til bústað sín, um hann uttan steðg hevur verið í starvi á sama skipi ella á skipum, sum hoyra sama reiðara til, í 6 mánaðir. Føroya Landsstýri og reiðarin rinda hvør helvtina av útreiðslunum av ferðini fróknað uppihald.

2. stk. Sjómaður skal tó halda fram í starvi sínum í upp til ein mánað, um tað er væntandi, at skipið í hesum tíðarskeiði kemur í havn, haðani heimferðin fer at gerast munandi ódýrari ella lagaligari.

3. stk. Fer sjómaðurin av eftir egna uppsøgn ella avfaringarfráboðan, skal krav um fría heimferð verða sett í seinasta lagi saman við uppsøgnini ella umsóknini um avfaring.

4. stk. Konsulin stílar fyri heimferðini ella, um ikki danskur konsul er á staðnum, tá skiparin. Stílar konsulin fyri heimferðini, skal skiparin, tá hetta verður kravt, seta trygd fyri reiðarans parti av útreiðslunum.

5. stk. Tá ið soleiðis ber til, at sjómaður sleppur ikki heim aftur til Føroya, og vissa er um, at hetta kemst av fíggjarligum trupulleikum hjá reiðaranum, skal landsstýrið rinda ferðarkostnaðin, haruppií uppihald, sbr. tó næsta punktum. Landsstýrið tekur avgerð um, hvørt heimferðakostnaðurin skal verða afturkravdur frá reiðaranum.

erne, og som i de sidste 3 måneder ikke har haft adgang til at fratræde i færøsk havn, har ret til fri rejse til sin bopæl, hvis han uden afbrydelse har været i tjeneste på samme skib eller på skibe tilhørende samme reder i 6 måneder. Landet og rederen betaler hver halvdelen af udgifterne ved rejsen med underhold.

Stk. 2. Sømanden skal dog fortsætte tjenesten i indtil 1 måned, hvis det kan forventes, at skibet inden for den tid kommer til en havn, hvorfra hjemrejsen kan ordnes væsentligt billigere eller lettere.

Stk. 3. Fratræder sømanden efter egen opsigelse eller afskedsbegæring, skal krav om fri hjemrejse fremsættes senest samtidig med opsigelsen eller begæringen om afsked.

Stk. 4. Hjemrejsen ordnes af konsulen eller, hvis der ikke er dansk konsul på stedet, af skibsføreren. Ordner konsulen hjemrejsen, skal skibsføreren på forlangende stille sikkerhed for rederens andel af udgifterne.

Stk. 5. Sker det, at en sømand ikke kan komme hjem til Færøerne, og der er sikkerhed for, at dette skyldes økonomiske vanskeligheder hos rederiet, skal landsstyret betale rejseomkostningerne, herunder ophold, jfr. dog næste punktum. Landsstyret afgør, om hjemsendelsesomkostningerne skal kræves tilbagebetalt af rederiet.

2. Rættur sjómansins at sleppa av

§ 9. Sjómaður við barn hevur rætt til at krevja at sleppa av, tá tað við fyriliti at henni sjálvari, føðinginni, ið stendur

2. Sømandens ret til at kræve afsked

§ 9. En gravid søfarende har ret til at kræve afsked, når det af hensyn til hende selv, den forestående fødsel eller

fyri framman ella barninum verður hildið at vera neyðugt. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um rættin til at fara av og um rætt til fría ferð við uppihaldi til bústaðin hjá viðkomandi í Føroyum fyri landskassans rokning.

§ *10.* Fær sjómaður eftir hýringina boð um, at hjúnafelagi ella barn hansara er deytt ella illa sjúkt, kann hann krevja at sleppa av. Í slíkum førum rindar landskassin útreiðslurnar til heimferðina.

2. stk. Sjómaður kann eisini krevja at sleppa av, um hann eftir hýringina fær boð um, at honum á øðrum skipi stendur starv í boði og á hægri stigi enn tað, hann hevur, ella annað starv, sum hevur veruligan týdning fyri hann, ella um aðrar umstøður, sum gera tað til vælferðarmál hjá honum at sleppa av. Verður skipið av hesum ikki sjódygt, sleppur sjómaður tó ikki av sambært 1. pkt., uttan skikkaður maður fæst í hansara stað.

3. stk. Sjómaður skal endurgjalda reiðaranum útreiðslurnar av at útvega nýggjan mann sambært 2. stk. Endurgjaldið kann verða sett niður ella falla burtur; tað veldst um, hvussu long tænastutíð, ið er eftir, og umstøðurnar annars.

§ *11.* Sjómaðurin hevur rætt at krevja at sleppa av, um:

1) skipið ikki er sjódygt, ella tilhaldsrúm hjá manningini eru heilsuskaðilig, og skipsførarin ikki sær til, at bøtt verður um brekini,
2) skiparin ímóti § 54 ikki letur skipið sýna, ella
3) sjómaðurin er illa viðfarin umborð,

barnet må anses for påkrævet. Landsstyret kan fastsætte regler om retten til at fratræde og om ret til fri rejse med underhold til den pågældendes bopæl på Færøerne for landets regning.

§ *10.* Får en sømand efter forhyringen underretning om, at hans ægtefælle eller barn er afgået ved døden eller er alvorligt syg, kan han kræve afsked. I sådanne tilfælde betaler landskassen udgifterne til hjemrejsen.

Stk. 2. En sømand kan også kræve afsked, hvis han efter forhyringen får underretning om, at han på andet skib kan få stilling af højere grad end den, han har, eller anden stilling af væsentlig betydning for ham, eller om andre omstændigheder, som gør det til en velfærdssag for ham at kunne fratræde. Bliver skibet derved usødygtigt, kan sømanden dog kun kræve afsked efter 1. pkt., hvis en kvalificeret mand kan skaffes i hans sted.

3. stk. Sømanden skal erstatte rederen udgifterne ved at skaffe en ny mand efter stk. 2. Erstatningen kan nedsættes eller bortfalde under hensyn til sømandens resterende tjenestetid og omstændighederne i øvrigt.

§ *11.* Sømanden har ret til at kræve afsked, hvis:

1) skibet er usødygtigt, eller mandskabets opholdsrum er sundhedsfarlige og skibsføreren ikke sørger for, at manglerne afhjælpes,
2) skibsføreren i strid med § 54 undlader at lade skibet syne, eller
3) sømanden har været udsat for mis-

og skiparin, hóast hann visti um tað, hevur ikki verið honum til verndar.

2. stk. Sjómaður, sum fer av sambært 1. stk., hevur rætt til endurgjald og fría ferð við uppihaldi sambært § 18, 1. og 2. stk.

§ *12.* Sjómaðurin hevur rætt til at krevja at sleppa av, um tað eftir hýringina vísir seg, at:

1) vandi er fyri, at skipið verður tikið av krígsførandi ella at fáa krígsskaða ella at koma í javnbættisligar støðu, ella tílíkur vandi er vaksin veruliga, ella
2) tað gongur ring farsótt í havn, hagar skipið er ætlað at fara.

2. stk. Tað liggur á skipsføraranum við at sláa upp ella á annan hátt at gera manningina kunnuga við ferðaætlanina og broytingar í ferðaætlanini hjá skipinum.

3. stk. Krav um at sleppa av skal verða sett fram, so skjótt sum sjómaðurin er kunnaður um málið. Um ferðin ikki er byrjað, hevur sjómaður rætt til at fara av beinanvegin og annars í fyrstu havn ella havnarlag, skipið kemur til. Kemur skipið ikki í havn ella til havnarlag, áðrenn tað væntandi skal sigla farleiðøki, har sum umstøðurnar eru slíkar sum nevndar í 1. stk., skal skiparin eftir áheitan sjómansins geva honum høvi til at fara av, um møguleiki gevst at seta hann í land.

4. stk. Fer sjómaðurin av, ber reiðarin tríggjar fjórðingar og sjómaðurin ein fjórðing av útreiðslunum til ferð við uppihaldi til heimstaðin ella eftir avgerð reiðarans til hýringarstaðin. Landið endurrindar ein triðing av tí upphædd, sum reiðarin hevur goldið

handling om bord på skibet, uden at skibsføreren trods kendskab hertil har ydet ham beskyttelse.

Stk. 2. En sømand, der fratræder efter stk. 1, har ret til erstatning og fri rejse med underhold efter § 18, stk. 1 og 2.

§ *12.* Sømanden har ret til at kræve afsked, hvis det efter forhyringen viser sig, at der:

1) er fare for, at skibet vil blive opbragt af krigsførende, udsat for krigsskade eller for en faretruende situation, der kan ligestilles hermed, eller en sådan fare er blevet væsentligt forøget, eller
2) hersker ondartet epidemi i en havn, som skibet skal anløbe.

Stk. 2. Det påhviler skibsføreren ved opslag eller på anden måde at gøre mandskabet bekendt med skibets rejseplan og med ændringer heri.

Stk. 3. Krav om afsked skal fremsættes snarest efter, at sømanden har fået kundskab om forholdet, hvis rejsen ikke er påbegyndt, har sømanden ret til at fratræde straks og ellers i den første havn eller red, skibet anløber. Skal skibet ikke anløbe nogen havn eller red, forinden det må forventes at passere områder, hvor der hersker tilstande som nævnt i stk. 1, skal skibsføreren efter sømandens anmodning give denne adgang til at fratræde, såfremt der opstår mulighed for at landsætte den pågældende.

Stk. 4. Fratræder sømanden, betaler rederen tre fjerdedele og sømanden en fjerdedel af udgifterne til rejse med underhold til hjemstedet eller efter rederens bestemmelse til forhyringsstedet. Landet refunderer en tredjedel af det

fyri útreiðslur sjómansins til ferðingar við uppihaldi til heimstaðin ella til hýringarstaðin.

5. stk. 4. stk. fer ikki gildi, um samsvarandi starv er at fáa til sjómannin á øðrum føroyskum skipi á avfaringarstaðnum.

beløb, som rederen har betalt til sømandens udgifter til rejse med underhold til hjemstedet eller til forhyringsstedet.

Stk. 5. Stk. 4 finder ikke anvendelse, hvis der kan skaffes sømanden tilsvarende stilling på andet færøsk skib på fratrædelsesstedet.

§ *13.* Hevur sjómaður tikið hýru fyri eina tilskilaða ferð, og hon verður broytt munandi, kann hann krevja at sleppa av, § 12, 3. stk., 1. og 2. pkt., fáa samsvarandi gildi.

2. stk. Fer sjómaðurin av, hevur hann rætt til hýru fyri ein mánað eftir, at hann er farin úr starvinum. Harafturat hevur hann rætt til fría ferðing við uppihaldi til hýringarstaðin, um hann fer av, áðrenn ferðin er byrjað, og annars til avtalaða fráfaringarstaðin.

§ *13.* Er en sømand forhyret for en bestemt rejse, og denne bliver væsentligt forandret, kan han kræve afsked. § 12, stk. 3, 1. og 2. pkt. finder tilsvarende anvendelse.

Stk. 2. Fratræder sømanden, har han ret til hyre for en måned efter tjenesteforholdets ophør. Desuden har han ret til fri rejse med underhold til forhyringsstedet, hvis han fratræder, før rejsen er begyndt, og ellers til det aftalte fratrædelsessted.

§ *14.* Missir skipið rættin til at hava føroyskt flagg, kann sjómaðurin krevja at sleppa av, um ikki annað skilst av avtaluni.

2. stk. Sama er, um skipið verður yvirtikið av øðrum føroyskum reiðara, og sjómaðurin aftan á fyrispurning frá skipsføruranum sigur frá sum skjótast, at hann ætlar sær ikki at halda fram í starvinum hjá tí nýggja reiðaranum.

3. stk. Heldur starv sjómansins sambært 1. stk. uppat, hevur hann rætt til endurgjald og fría ferð við uppihaldi sambært § 18, 1. og 2. stk.

§ *14.* Mister skibet retten til at føre færøsk flag, kan sømanden kræve afsked, hvis ikke andet følger af aftalen.

Stk. 2. Det samme gælder, hvis skibet overtages af en anden færøsk reder, og sømanden på forespørgsel af skibsføreren snarest meddeler, at han ikke ønsker at fortsætte tjenesteforholdet hos den nye reder.

Stk. 3. Ophører sømandens tjenesteforhold efter stk. 1, har han ret til erstatning og fri rejse med underhold efter § 18, stk. 1 og 2.

§ *15.* Sjómaður, sum eftir avtaluni ella reglunum í hesum bólki hevur rætt at fara av, skal vera í starvinum til at taka lut í arbeiði, sum gerst neyðugt,

§ *15.* En sømand, der efter aftalen eller efter bestemmelse i dette kapitel har ret til at fratræde, skal forblive i tjenesten for at yde bistand ved arbejde, som

tá ið skipið kemur í havn, tó ikki meir enn 48 tímar eftir komu. Hetta er tó ikki galdandi, tá farið verður av sambært § 10, 1. stk.
2. stk. Skal sjófrágreiðing verða givin, skal hann móti hýru og uppihaldi vera á staðnum, til frágreiðingin er givin.

nødvendigt må udføres, naar skibet kommer i havn, dog ikke ud over 48 timer efter ankomsten. Dette gælder dog ikke ved fratrædelse efter § 10, stk. 1.
Stk. 2. Skal søforklaring afgives, skal han mod hyre og underhold blive pa stedet, til forklaringen er afgivet.

3. Rættur skiparans at koyra av sjómann v.m.

3. Skibsførerens ret til at afskedige en sømand

§ *16.* Um sjómaður av sjúku ella skaða ikki er førur fyri at røkja starv sítt, verður hetta at meta sum lógligt forfall, uttan so at hann við setanina svikafult hevur dult sjúkuna ella skaðan, ella hann eftir setanina við vilja ella við grovum ósketni hevur fingið sjúkuna ella skaðan.
2. stk. Verður sjómaður av sjúku ella løsti í longri tíð ikki førur fyri at røkja starv sítt, ella hevur hann sjúku, sum setir tey umborð í vanda, kann hann verða uppsagdur, uttan mun til hvat avtalað er í starvsavtaluni um avfaringarstað.

§ *16.* Bliver en sømand på grund af sygdom eller legemsskade ude af stand til at udføre sit arbejde, betragtes dette som lovligt forfald, medmindre han ved sin ansættelse svigagtigt har forti et sygdommen eller legemsskaden, eller han efter ansættelsen forsætligt eller ved grov uagtsomhed har pådraget sig sygdommen eller legemsskaden.
Stk. 2. Bliver en sømand på grund af sygdom eller skade i længere tid ikke i stand til at udføre sit arbejde, eller lider han af sygdom, der medfører fare for de ombordværende, kan han opsiges, uanset hvad der måtte være aftalt i tjenesteaftalen om fratrædelsessted.

§ *17.* Skiparin kann koyra sjómann av, um hann:
1) er ónýtiligur í starvi sínum,
2) ikki komin umborð í rættari tíð, og skipið skal fara, ella annar má verða settur í hansara stað,
3) ger grov misbrot, eitt nú við endurtiknum ólýdni, harðrendari atgerð móti øðrum umborð ella við fyllskapi uppísaman,
4) fremur stuldur ella annað grovt brotsverk,

§ *17.* Skibsføreren kan afskedige en sømand, hvis han:
1) er uduelig til sin tjeneste,
2) ikke kommer om bord i rette tid, og skibet skal afgå, eller en anden må antages i hans sted,
3) forser sig groft i tjenesten, såsom ved gentagen ulydighed, voldsom adfærd mod andre ombordværende eller gentagen beruselse,
4) gør sig skyldig i tyveri eller anden grov forbrydelse,

5) voldur skipinum álvarsamar trupulleikar av at krógva fólk umborð,
6) fjalir góðs umborð, sum er undir tollskyldu, ella sum ikki er loyvt at flyta út av fráfaringarstaðnum ella at flyta inn á komustaðin, ella
7) leggur træstu um starvsviðurskiftini fyri útlendskt vald.

2. stk. Ætlar skiparin at koyra sjómunn av sambært 1. stk., nr. 3 7, skal hann siga sjómanninum frá hesum sum skjótast og í seinasta lagi innan 7 dagar eftir, at hann hevur fingið kunnleika um tað, sum gevur grund til av koyringina, uttan so at serligar grundir gera tað neyðugt at fara út um hesa freist.

3. stk. Verður sjómaður avkoyrdur sambært 1. stk., hevur hann ikki rætt til hýru í longri tíð, enn hann hevur starvast. Um tað við avkoyring sambært 1. stk., nr. 2 vísir seg, at sjómaðurin er ósekur, og hann er óarbeiðsførur av sjúku ella likamsbreki, hevur hann tó rætt til hýru sambært § 29, 2. stk.

5) udsætter skibet for alvorlige vanskeligheder ved at skjule nogen om bord,
6) skjuler goods om bord, som er toldpligtigt, eller som det er forbudt at udføre fra afgangsstedet eller at indføre til bestemmelsesstedet, eller
7) indbringer en tvist om tjenesteforholdet for udenlandsk myndighed.

Stk. 2. Vil skibsføreren afskedige en sømand efter stk. 1, nr. 3-7, skal han meddele sømanden dette snarest og senest inden 7 dage efter, at han har fået kundskab om det forhold, der begrunder afskeden, medmindre særlige grunde før en overskridelse af denne frist nødvendig.

Stk. 3. Afskediges en sømand efter stk. 1, har han ikke ret til hyre for længere tid, end han har gjort tjeneste. Hvis det ved afsked efter stk. 1, nr. 2, viser sig, at sømanden er uden skyld, og han er uarbejdsdygtig på grund af sygdom eller legemsskade, har han dog ret til hyre efter § 29, stk. 2.

§ *18.* Verður sjómaður avkoyrdur uttan slíka grund, sum nevnd er í § 17, hevur hann rætt til hýru fyri 2 mánaðir eftir, at hann er farin av, um ikki vanligar reglur um endurgjald geva rætt til størri upphædd. Fyri fiskiskip verður frammanfyri nevnda hýru ásett sambært býti í sáttmálunum faldað við minstulønini.

2. stk. Er ávísur avfaringarstaður avtalaður, hevur hann hurumfrumt rætt til fría ferð við uppihaldi hagar. Kann starvsavtalan sambært § 6 bert verða uppsøgd til at halda uppat í føroyskari havn, hevur hann rætt til fría ferð við

§ *18.* Afskediges en sømand uden sådan grund, som nævnes i § 17, har han ret til hyre for 2 måneder efter tjenesteforholdets ophør, såfremt almindelige erstatningsregler ikke hjemler ret til et større beløb. For fiskere fastsættes foranstående hyre i henhold til fordeling i overenskomsten ganget med mindstelønnen.

Stk. 2. Er et bestemt fratrædelsessted aftalt, har han desuden ret til fri rejse med underhold til dette. Kan tjenesteaftalen efter § 6 kun opsiges til ophør i færøsk havn, har han ret til fri rejse med underhold til sådan havn eller,

uppihaldi til sliku havn ella, um hann hevur bústað í Føroyum, til bústaðin.
3. stk. Fer sjómaður av eftir uppsøgn á avtalaðum ella sambært § 6 ásettum avfaringarstaði eftir avgerð skipsførarans áðrenn uppsagnarfreistin er farin og við hýru og uppihaldi, til freistin er farin, eru 1. og 2. stk. ikki galdandi.

hvis han har bopæl på Færøerne, til bopælen.
Stk. 3. Fratræder en sømand efter opsigelse på aftalt eller i medfør af § 6 bestemt fratrædelsessted efter skibsførerens bestemmelse før opsigelsesfristens udløb med hyre og underhold til fristens udløb, finder stk. 1 og 2 ikke anvendelse.

4. Endi á starvsviðurskiftunum, tá ið skipið ferst

§ *19.* Fer skip fyri skeyti av skipbroti, ella verður tað eftir skipbrot hildið vera ómøguligt at gera aftur, heldur starv sjómansins uppat, um ikki annað er avtalað. Móti hýru og uppihaldi skal hann tó taka lut í bjargingini og vera á staðnum, til sjófrágreiðing hevur verið.
2. stk. Heldur starvið sum nevnt uppat, hevur sjómaðurin rætt til neyðug klæði og fría ferð við uppihaldi til bústað sín fyri rokning reiðarans.
3. stk. Á heimferðini, sum nevnd er í 2. stk., hevur sjómaðurin rætt til hýru. Hann hevur harafturat rætt til hýru fyri ta tíð, hann er arbeiðsleysur orsakað av skipbrotinum, tó í longsta lagi fyri 2 mánaðir út um ta tíð, hann fær hýru sambært 1. stk.

4. Tjenesteforholdets ophør ved tab af skibet

§ *19.* Går skibet tabt ved søulykke, eller anses det efter søulykke for uistandsætteligt, ophører en sømands tjenesteforhold, hvis ikke andet følger af aftalen. Mod hyre og underhold skal han dog deltage i bjærgningen og blive på stedet, til søforklaring er afgivet.
Stk. 2. Ophører tjenesteforholdet som nævnt, har sømanden ret til nødvendig beklædning samt fri rejse med underhold til sin bopæl for rederens regning.
Stk. 3. Under den i stk. 2 nævnte hjemrejse har sømanden ret til hyre. Han har endvidere ret til hyre for den tid, han er arbejdsløs som følge af forliset, dog højest for 2 måneder ud over den tid, for hvilken han får hyre efter stk. 1.

5. Ávísar felagsreglur við avferð

§ *20.* Um myndugleikarnir í fremmandari havn, har sjómaður skal fara av, nokta honum innferðarloyvi ella treyta innferðarloyvi av tryggd, hann ikki fær lokið, skal hann vera í starvi-

5. Visse fællesregler ved fratrædelse

§ *20.* Hvis myndighederne i en fremmed havn, hvor en sømand skal fratræde, nægter ham adgang til landet eller betinger hans adgang dertil af en sikkerhed, som han ikke kan stille, skal

inum, til skipið kemur í havn, har tað ber til at fara av. Hann hevur eisini rætt til at vera verandi í starvinum, tá ið ikki kenst órimiligt.

han forblive i tjenesten, indtil skibet kommer til en havn, hvor fratrædelse kan finde sted. Han har også ret til at forblive i tjenesten, hvor dette ikke vil virke urimeligt.

6. Útgjalding og útrokning av hýru

§ *21.* Hýran gongur frá og við tí degi, sjómaðurin tekur við starvinum umborð. Um so er, at hann eftir kravi reiðarans letur frá sær siglingarbók ella pass frammanundan, ella hann má gera ferð frá hýringarstaðnum til skipið, gongur hýran tó frá og við tí degi, hann læt tey frá sær ella fór avstað.
2. stk. Hýran gongur til og við tí degi, starvið heldur uppat, ella, um farið verður av eftir nevnda dag, til og við avfaringardegnum.
3. stk. Hýra verður ikki goldin fyri ta tíð, sjómaðurin sleppur sær undan starvi sínum og hevur ikki rætt til tess.

6. Beregning og udbetaling af hyre

§ *21.* Hyren løber fra og med den dag, sømanden tiltræder tjenesten om bord. Hvis han på forlangende af rederen afleverer søfartsbog eller pas forinden eller må foretage rejse fra forhyringsstedet for at komme til skibet, løber hyren dog fra og med den dag, da afleveringen finder sted eller rejsen påbegyndes.
Stk. 2. Hyren løber til og med den dag, tjenesten ophører, eller, hvis fratrædelse sker efter nævnte dag, til og med fratrædelsesdagen.
Stk. 3. Hyre betales ikke for tid, i hvilken sømanden uberettiget unddrager sig sin tjeneste.

§ *22.* Til útrokningar av hýru fyri part av mánaði verður roknað við 1/30 um dagin av tí mánaðarligu hýruni.
2. stk. Er hýran avtalað sum ein føst upphædd fyri ferðina, verður tað, sum tilskilað er í starvsavtaluni um ætlandi longd av ferðini, lagt til grundar, tá ið hýra skal vera roknað eftir tíð.
3. stk. Sjálvt um ferðin gerst styttri enn ætlað við hýringina, eigur sjómaðurin alla ta treytaðu hýruna. Gerst ferðin longri enn ætlað, eigur hann viðbót lutfalsliga, um annað ikki er avtalað.
4. stk. Hýran á fiskiskipum fyri part av túri verður roknað sum størra upphæddin av:

§ *22.* Ved beregning af hyre for en del af en måned regnes den pr. dag til 1/30 af den månedlige hyre.
Stk. 2. Er hyren aftalt til et bestemt beløb for rejsen, lægges den i tjenesteaftalen optagne angivelse af rejsens antagelige varighed til grund i tilfælde, hvor hyre skal beregnes efter tid.
Stk. 3. Selv om rejsen kommer til at vare kortere tid end forudsat ved forhyringen, har sømanden krav på hele den aftalte hyre. Kommer rejsen til at vare længere end forudsat, har han krav på et forholdsmæssigt tillæg, hvis ikke andet er aftalt.
Stk. 4. På fiskeskibe beregnes hyren

a. parti av fongi roknað á vanligan hátt fyri tað tíðarskeið, viðkomandi hevur verið umborð, ella
b. parti av fongi fyri allan túrin roknað út sum brotpartur við tí tíðarskeiði, hann hevur verið umborð í mun til tað tíðarskeið, túrurin vardi.

for en del af un tur som det største beløb af:
a. part af fangst beregnet på sædvanlig måde for det tidsrum, vedkommende har været ombord, eller
b. part af fangst for hele turen beregnet som brøkdel af det tidsrum, han har været ombord i forhold til det tidsrum, som turen har varet.

§ *23.* Verður túrur gjørdur, allur sum hann er, ella partvísur við minni manning enn ætlað, ella fækka teir arbeiðsføru av manningini á túrinum, verður spard hýra fyri tíðina, skipið er í sigling, býtt javnt millum sjómenninar, sum starva í tí fækkaða manningarbólkinum, uttan so at prógvað verður, at fækkanin hevur ikki økt um arbeiði teirra.
2. stk. Í tí spardu hýruni verða tær øktu útreiðslurnar til yvirtíðargjald, sum komast av fækkanini av manningini, frádrignar.
3. stk. Partur sjómans av spardari hýru skal ikki fara upp um ta hýru, hann sjálvur fær.
4. stk. Er bert ein stýrimaður eftir, verður spard stýrimanshýra býtt javnt millum hann og skipsføraran.

§ *23.* Bliver en rejse helt eller delvis udført med mindre mandskab end forudsat ved forhyringen, eller bliver det arbejdsdygtige mandskab formindsket under rejsen, fordeles sparet hyre for den tid, skibet er i søen, ligeligt mellem sømændene af den formindskede mandskabsgruppe, medmindre det godtgøres, at formindskelsen ikke har påført gruppen forøget arbejde.
Stk. 2. I den sparede hyre fradrages de øgede udgifter til overtidsbetaling, der skyldes formindskelsen af mandskabet.
Stk. 3. En sømands ret til andel i sparet hyre kan ikke overstige den hyre, han selv modtager.
Stk. 4. Er der kun én styrmand tilbage, deles sparet styrmandshyre lige mellem ham og skibsføreren.

§ *24.* Sjómaður kann bert krevja hýru útgoldna, tá skipið liggur í havn, og í sama landi ikki oftari enn sjeynda hvønn dag.
2. stk. Hýra verður útgoldin í reiðum peningi, uttan so at sjómaðurin krevur ávísing til reiðaran. Útgjald kann verða kravt í mynti staðsins eftir dagsins kursi.
3. stk. Sjómaður kann krevja hýru útgoldna sum mánaðarlig úttøkugjald

§ *24.* En sømand kan kun kræve hyre udbetalt, når skibet ligger i havn, og i samme land ikke oftere end hver syvende dag.
Stk. 2. Hyre udbetales kontant, medmindre sømanden forlanger anvisning på rederen. Udbetaling kan kræves i stedets mønt efter dagens kurs.
Stk. 3. En sømand kan kræve hyre udbetalt i form af månedlige træk til en bestemt person på Færøerne eller ind-

til ávist fólk í Føroyum ella til innsetingar í føroyskan peningastovn. Hann kann tó ikki krevja útgjald eftir meira enn trimum úttøkuseðlum í senn.

4. stk. Sjónaður kann uttan útreiðslu senda hýru úr útlondum til Føroya gjøgnum danskan konsul. Sent verður fyri rokning og ábyrgd landskassans.

5. stk. Tá talan er um fiskiskip, letur reiðarin manningini avrokning og ágóða í seinasta lagi 2 vikur eftir, at veiðan er landað og seld. Fæst veiðan frá einum túri ikki seld innan 4 vikur eftir landing, skal manningin verða avroknað fyribils og túrurin verða uppgjørdur so neyvt sum til ber.

§ *25.* Uttan loyvi sjómansins kann, umframt upphæddir, sum reiðarin eftir serligum lógarreglum hevur skyldu til at halda eftir, bert verða drigið frá hýruni fyri slík krøv, sum sjómaðurin eigur at rinda, tá ið hann er komin undir endurgjaldsábyrgd í starvi sínum. Drigið skal verða frá hýru, sum útgoldin verður sjómanni, heldur enn frá hýru, sum verður útgoldin við úttøku, uttan so at sjómaðurin tekur aðra avgerð.

§ *26.* Hvønn mánað skal sjómaðurin fáa uppgerð yvir vunna hýru við viðbót, útgoldnari hýru og tí kursi, sum hevur ligið sum grund, um goldið er út í øðrum mynti enn tí avtalaða.

sat i færøsk pengeinstitut. Han kan dog ikke kræve udbetaling efter flere end tre sideløbende træksedler.

Stk. 4. En sømand kan uden udgift sende hyre fra udlandet til Færøerne gennem dansk konsul. Forsendelsen sker på landets regning og risiko.

Stk. 5. Hvor det drejer sig om fiskeskibe, giver rederen mandskabet afregning og tilgodehavende senest 2 uger efter, at fangsten er udskibet og solgt. Kan fangsten fra en fisketur ikke blive solgt inden 4 uger efter udskibningen, skal mandskabet afregne foreløbig, og fisketuren skal opgøres så nøjagtigt som muligt.

§ *25.* Uden sømandens samtykke kan der foruden for sådanne beløb, som det i henhold til særlig lovbestemmelse er pålagt rederen at tilbageholde, kun gøres fradrag i hyren for beløb til dækning af erstatningsansvar, som en sømand har pådraget sig i tjenesten. Fradrag skal ske i hyre, der udbetales sømanden, fremfor i hyre, der udbetales som træk, medmindre sømanden bestemmer andet.

§ *26.* Der skal udleveres sømanden en månedlig opgørelse over indtjent hyre med tillæg, udbetalt hyre og den kurs, der er lagt til grund, hvis udbetaling er sket i anden mønt end den aftalte.

7. Sjúkrarøkt og sjúkrahýra

§ *27.* Sjómaður skal lata seg læknakanna, tá skiparin krevur tað.

7. Sygepleje og sygehyre m.v.

§ *27.* En sømand skal lade sig undersøge af en læge, når skibsføreren forlanger det.

2. stk. Skiparin skal, alt tað er gjørligt, láta sjómannin læknakanna, tá ið tað er haldandi, at sjómaðurin er sjúkur.
3. stk. Læknakanningar sambært 1. og 2. stk. verða gjørdar uttan útreiðslu fyri sjómannin.
4. stk. Er sjómaður sjúkur ella hevur hann fingið skaða, skal skipsførarin syrgja fyri, at hann fær nóg góða røkt umborð ella á landi, so eisini uppihald, læknahjálp og læknaráð.
5. stk. Er grund til at halda, at sjómaður hevur sjúku, sum setir tey umborð í vanda, skal skipsførarin fáa hann í land, um ikki fæst nóg væl tryggjað móti vandanum umborð.
6. stk. Er sjúkur ella skaddur sjómaður ikki sjálvur førur fyri at ansa sínum ognarhlutum, skal skiparin hava umsorgan fyri teimum.
7. stk. Verður sjúkur ella skaddur sjómaður latin eftir í útlondum, skal skiparin geva hann til umsorgan konsulsins ella, um ikki danskur konsul er á staðnum, á annan hátt fáa honum nóg góða røkt og boða næsta danska konslinum frá. Um sjómaðurin so vil, skal skiparin siga hansara næstu frá.

Stk. 2. Skibsføreren skal så vidt muligt lade sømanden undersøge af en læge, hvis der er grund til at antage, at sømanden er syg.
Stk. 3. Lægeundersøgelser efter stk. 1 og 2 foretages uden afgift for sømanden.
Stk. 4. Er en sømand syg eller kommet til skade, skal skibsføreren sørge for, at han om bord eller i land får forsvarlig pleje, derunder underhold, lægehjælp og lægemidler.
Stk. 5. Er der grund til at antage, at en sømand lider af en sygdom, som medfører fare for de ombordværende, skal skibsføreren lade ham bringe i land, hvis betryggende foranstaltninger mod faren ikke kan træffes om bord.
Stk. 6. Kan en syg eller tilskadekommet sømand ikke selv tage vare på sine ejendele, skal skibsføreren drage omsorg for dem.
Stk. 7. Bliver en syg eller tilskadekommet sømand efterladt i udlandet, skal skibsføreren overgive ham til konsulens forsorg eller, hvis der ikke er dansk konsul på stedet, på anden måde skaffe ham forsvarlig pleje og underrette nærmeste danske konsul. Hvis sømanden ønsker det, skal skibsføreren underrette hans nærmeste pårørende.

§ 28. Tá skiparin í útlondum letur sjúkan ella skaddan sjómann donskum konsli upp í hendi, kann konsulin krevja trygd fyri tær útreiðslur, reiðarin skal gjalda sambært §§ 30 og 34 í sambandi við røkt og jarðarferð hjá sjómanni.
2. stk. Skiparin skal flýggja konslinum upphæddir, sum sjómaðurin eigur á,

§ 28. Når skibsføreren i udlandet efterlader en syg eller skadet sømand til dansk konsuls forsorg, kan konsulen kræve sikkerhed stillet for de udgifter, som rederen skal betale efter §§ 30 og 34 i forbindelse med en sømands pleje og begravelse.
Stk. 2. Skibsføreren skal overgive konsulen beløb, som sømanden har krav

ella man fara at eiga á sambært § 29, 1. stk.

3. stk. Hýruupphædd, sum sjómaðurin hevur rætt til, kann hann krevja útgoldna, uttan so at upphæddirnar ætlandi skulu vera fyri útreiðslur fyri rokning sjómansins, ella tað er soleiðis vorðið við honum, at hann er ógnaður at taka sær av sínum egna.

§ *29.* Meðan sjómaðurin er í starvi, hevur hann rætt til hýru, sjálvt um hann er óarbeiðsførur av sjúku ella skaða.

2. stk. Er sjómaður sjúkur ella skaddur, tá starvið heldur uppat, heldur hýran fram so leingi, sum hann er óarbeiðsførur, í longsta lagi tó í 2 mánaðir. Eru ávís tekin um sjúku ella skaða ikki ávíst, hevur hann tó ikki rætt til hýru í fleiri dagar, enn hann hevur verið í starvinum. Kemst óarbeiðsføri av kynssjúku, rindar Føroya Landsstýri hýruna.

3. stk. Sjómaðurin hevur ikki rætt til hýru eftir 1. ella 2. stk. fyri ta tíð, hann er óarbeiðsførur av sjúku ella skaða, hann svikafult hevur dult við setanina. Sama er galdandi, um hann eftir setanina við vilja ella við grovum ósketni verður løstaður ella sjúkur, burtursað frá kynssjúku.

4. stk. Er sjómaður við barn, tá starvið heldur uppat, hevur hon rætt til hýru, so leingi hon er uttan arbeiði, í longsta lagi tó 2 mánaðir. Hetta hevur tó ikki gildi, um hon við setanina duldi, at hon visti ella helt fyri vist, at hon var við barn.

5. stk. Reiðarin á fiskiskipum skal tryggja sjómann móti inntøkumissi í tí

på, eller som han kan få krav på efter § 29.

Stk. 3. Hyrebeløb, som sømanden har krav på, kan han kræve udbetalt, medmindre beløbene må påregnes at medgå til dækning af udgifter for sømandens regning, eller han er i en tilstand, der gør ham uegnet til at varetage sine anliggender.

§ *29.* Under tjenesten har sømanden ret til hyre, selv om han er uarbejdsdygtig som følge af sygdom eller legemsskade.

Stk. 2. Er sømanden syg eller skadet ved tjenestens ophør, løber hyren videre, så længe han er uarbejdsdygtig, dog højst 2 måneder. Er bestemte tegn på sygdom eller legemsskade ikke påvist, har han dog ikke ret til hyre i flere dage, end han har været i tjenesten. Skyldes uarbejdsdygtigheden kønssygdom, betales hyren af Færøernes landsstyre.

Stk. 3. Sømanden har ikke ret til hyre efter stk. 1 eller 2 for den tid, han er uarbejdsdygtig som følge af sygdom eller skade, han svigagtigt har fortiet ved sin ansættelse. Det samme gælder, hvis han efter ansættelsen forsætligt eller ved grov uagtsomhed pådrager sig en legemsskade eller sygdom, bortset fra kønssygdom.

Stk. 4. Er den søfarende gravid ved tjenestens ophør, har hun ret til hyre, så længe hun er uden arbejde, dog højst 2 måneder. Dette gælder dog ikke, hvis hun ved ansættelsen har fortiet, at hun vidste eller bestemt formodede, at hun var gravid.

Stk. 5. Fiskeskibsredere skal forsikre sømand mod indtægtstab i det tilfæl-

føri, at hann óarboiðsførur fer í land á túri orsakað av sjúku ella skaða. Tryggingin skal tó í mesta lagi tryggja inntøkumiss fyri 60 dagar.

§ 30. Meðan sjómaðurin er í starvi, ber reiðarin allar útreiðslur av at rekta hann, burtursæð frá undantøkunum í 4.-6. stk.

2. stk. Er sjómaður sjúkur ella skaddur, tá starvið heldur uppat, hevur hann, burtursæð frá undantøkunum í 4.-6. stk., rætt til rekt fyri reiðarans rokning upp í 12 vikur, tó ikki meir enn 2 vikur eftir, at hann er komin til landið, har hann býr. Roknað verður frá avfaringardegnum ella, um hann ikki mynstrar av, frá tí degi, skipið fer.

3. stk. Fer sjómaður av vegna sjúku ella skaða, ella hevur hann, tá hann fer av, sjúku ella løst, sum kann bera í sær, at starvið heldur uppat, hevur hann harumframt rætt til fría ferð við uppihaldi til bústaðin fyri rokning reiðarans. Hevur sjómaðurin ikki bústað í Føroyum, kann reiðarin tó í staðin velja at geva sjómanninum fría ferð við uppihaldi til tann stað, har sjómaðurin hevði tilhald, tá hann varð hýraður, uttan so at myndugleikarnir á hesum stað nokta honum innferðarloyvi í landið ella geva honum loyvi við treytum um trygd, sum hann ikki fær lokið.

4. stk. Sjómaðurin hevur ikki rætt til rekt ella fría ferð eftir 1.-3. stk., um hann svikafult hevur dult sjúkuna ella løstin við setanina. Sama er, um hann eftir setanina við vilja ella av grovum ósketni verður skaddur ella sjúkur, burtursæð frá kynssjúku.

5. stk. Um sjómaður, sum hevur bústað í Føroyum, hevur kynssjúku ella

de, at han gar i land pa grund af urbejdsdygtighed, pa grund af sygdom eller skade. Forsikringen skal dog højst sikre indtægtstab i 60 dage.

§ 30. Under tjenesten bærer rederen med de i stk. 4-6 anførte undtagelser alle udgifter ved en sømands pleje.

Stk. 2. Er sømanden syg eller skadet ved tjenestens ophør, har han med de i stk. 4-6 anførte undtagelser ret til pleje for rederens regning i indtil 12 uger, dog ikke ud over 2 uger efter, at han er ankommet til det land, hvor han har bopæl. Tiden regnes fra fratrædelsesdagen eller, hvis han ikke afmønstres, fra den dag, da skibet afsejler.

Stk. 3. Fratræder en sømand på grund af sygdom eller legemsskade, eller lider han ved fratrædelsen af sådan sygdom eller skade, som kan foranledige tjenestens ophør, har han desuden ret til fri rejse med underhold for rederens regning til hjemstedet. Har sømanden ikke bopæl på Færøerne, kan rederen dog i stedet vælge at give sømanden fri rejse med underhold til det sted, hvor sømanden opholdt sig, da han blev forhyret, medmindre myndighederne på dette sted nægter ham adgang til landet eller betinger hans adgang dertil af en sikkerhed, som han ikke kan stille.

Stk. 4. Sømanden har ikke ret til pleje eller fri rejse efter stk. 1-3, hvis han svigagtigt har fortiet sygdommen eller legemsskaden ved sin ansættelse. Det samme gælder, hvis han efter ansættelsen forsætligt eller ved grov uagtsomhed pådrager sig en skade eller sygdom, bortset fra kønssygdom.

tuberklar, ber landskassin útreiðslurnar av røkt og heimferð sum nevnt í 2. og 3. stk., sbr. 4. stk.

6. stk. Reiðarin ella landskassin rinda ikki útreiðslurnar eftir 2. og 3. stk., sbr. 4. stk., í tann mun sjómaðurin er tryggjaður í sjúkrakassa, sjúkrafelag, tryggingarfelag ella almennari trygdarskipan.

Stk. 5. Hvis en sømand, der har hopael på Færøerne, lider af kønssygdom eller tuberkulose, betaler landet udgifterne ved den i stk. 2 og 3, jfr. stk. 4, nævnte pleje og hjemrejse.

Stk. 6. Rederen eller staten er fritaget for at betale udgifterne efter stk. 2 og 3, jfr. stk. 4, i det omfang sømanden er sikret i en sygekasse, sygeforening, forsikringsselskab eller social tryghedsordning.

§ *31.* Hevur skiparin í sambandi við, at sjúkur ella løstaður sjómaður er farin av í útlandinum, verið noyddur til at bera útreiðslur av heimsending ella røkt ella aðrari hjálp sambært fyriskipan um umsorganarrætt, sum reiðarin ikki eftir røttum eigur at bera, og sum ikki hevði sloppist undan við stuðli frá donskum konsli, tá kann endurgjald verða kravt frá landskassanum.

§ *31.* Har skibsføreren i forbindelse med syg eller skadet sømands frafærden i udlandet været nødt til at afholde udgifter til hjemsendelse eller pleje eller til anden hjælp ifølge forsorgsretlig forskrift, som ikke efter gældende ret påhviler rederen, og som ikke kunne være undgået gennem bistand af dansk konsul, kan erstatning kræves af landet.

8. Deyði og jarðarferð

§ *32.* Doyr sjómaður, skal skiparin siga næstingunum frá og stíla fyri jarðarferð ella líkbrenning hansara. Doyr sjómaðurin í útlondum, skal harafturat verða sagt næsta danska konslinum frá. Verður líkið brent, skal skipsførarin stíla fyri, at øskan verður send heim.

2. stk. Skiparin skal, so skjótt sum til ber, fáa tilvega yvirlit yvir tað, sum er eftir tann deyða umborð. At yvirlitið er rætt, skal verða váttað av 2 fólkum. Doyr sjómaður í útlandinum, skal skipsførarin lata næsta danska konslinum yvirlitið. Verður tað til ov miklan

8. Død og begravelse

§ *32.* Dør en sømand, skal skibsføreren underrette hans nærmeste pårørende og sørge for hans begravelse eller ligbrænding. Indtræffer dødsfaldet i udlandet, skal tillige nærmeste danske konsul underrettes. Finder ligbrænding sted, skal skibsføreren sørge for hjemsendelse af asken.

Stk. 2. Skibsføreren skal snarest muligt lade optage en fortegnelse over, hvad den afdøde har efterladt ombord. Fortegnelsens rigtighed skal bekræftes af 2 personer. Indtræffer dødsfaldet i udlandet, skal skibsføreren aflevere fortegnelsen til nærmeste danske kon-

bága at hava ognarlutir hins deyða umborð, skulu teir verða latnir konslinum.

§ *33.* Doyr sjómaður, gongur hýran til og við deyðadegnum, um hon ikki aður er hildin uppat sambært reglunum í hesum bólki.
2. stk. Gongur skipið burtur, uttan at tað spyrst, nær ið skaðin hendi, stendur hýran við, til tann tíð er úti, sum vanliga gongur hjá skipi sum tí burtur gingna somu árstíð at sigla frá tí staði, haðani seinast frættist frá tí, og til tann stað, hagar ferðin stóð.
3. stk. Doyr sjómaður í starvinum, hevur hjúnafelagi, ið livir eftir hann, ella børn undir 18 ár, sum hann hevur umsorganarskyldu fyri, rætt til hýru í 1 mánað. Hevur sjómaðurin, til hann doyði, starvast 2 ávikavist 3 ár hjá reiðaranum, verður hýra fyri 2 ávikavist 3 mánaðir tó goldin. Sama er galdandi, um sjómaður doyr, meðan hann eigur hýru eftir § 29, 2. stk. Í slíkum føri kann reiðarin tó draga hýru frá, sum hann hevur goldið ella skal gjalda eftir nevndu reglu.

§ *34.* Reiðarin ber útreiðslurnar av jarðarferð ella líkbrenning sjómans og heimsending og gravseting av øskuni, um sjómaðurin doyr í starvinum, ella meðan hann enn hevur rætt til røkt eftir § 30, 2. stk.
2. stk. Landskassin ber útreiðslurnar, sum nevndar eru í 1. stk., um sjómaður doyr, meðan hann hevur rætt til røkt eftir § 30, 5. stk.
3. Stk. § 30, 6. stk. og § 31 um, at reiðar-

sul. Kan de efterladte ejendele ikke uden ulempe beholdes om bord, skal de overgives til konsulen.

§ *33.* Dør en somand, løber hyren til og med dødsdagen, hvis den ikke ifølge bestemmelse i dette kapitel er ophørt at løbe tidligere.
Stk. 2. Bliver skibet borte, uden at det kan oplyses, nar ulykken indtraf, løber hyren videre til udløbet af den tid, som i almindelighed medgar for et skib som det forulykkede til en rejse pa samme årstid fra det sted, hvorfra man sidst havde efterretning om skibet, og til bestemmelsesstedet.
Stk. 3. Dør en sømand under tjenesten, har den efterlevende ægtefælle eller børn under 18 ar, over for hvem sømanden har forsørgerpligt, ret til hyre for 1 måned. Har sømanden ved dødsfaldet haft uafbrudt ansættelse i rederens tjeneste i henholdsvis 2 eller 3 år, betales dog hyre for henholdsvis 2 eller 3 måneder. Det samme gælder, hvis sømanden dør, mens han har ret til hyre efter § 29, stk. 2. I så fald kan rederen dog fradrage hyre, som han har betalt eller skal betale efter nævnte bestemmelse.

§ *34.* Rederen betaler udgifterne ved en sømands begravelse eller ved ligbrænding samt hjemsendelse og gravsætning af asken, hvis sømanden dør under tjenesten, eller mens han endnu har ret til pleje efter § 30, stk. 2.
Stk. 2. Landet betaler de udgifter, der er nævnt i stk. 1, hvis sømanden dør, mens han har ret til pleje efter § 30, stk. 5.
Stk. 3. § 30, stk. 6, og § 31 om rederens

in ella tað almenna sleppa undan at gjalda vissar útreiðslur av røkt av sjúkum ella skaddum sjómanni fær sama gildi viðvíkjandi útreiðslum í sambandi við deyða sjómans.

eller landets fritagelse for at betale visse udgifter ved pleje af en syg eller skadet sømand finder tilsvarende anvendelse, for så vidt angår udgifter i forbindelse med en sømands død.

9. Serligar reglur fyri fastlønt sjófólk

§ 35. Sjálvt um tænastan á skipi er av, fær § 29 um hýru undir sjúku, skaða ella barnsburði og § 33, 3. stk., um eftirhýru við deyða gildi, óansæð um sjómaðurin starvast á einum av skipunum hjá reiðarinum ta tíð, sjómaðurin verður óarbeiðsførur ella doyr. § 30 um røkt og fría ferð og § 34 um útreiðslur av jarðarferð fáa sama gildi, um sjómaðurin verður sjúkur, skaddur ella doyr, meðan hann er í landi, so sum reiðarin hevur givið boð um, uttan fyri føðiland sjómansins. Rætturin til røkt fevnir tó einans røkt uttan fyri heimlandið upp í 12 vikur eftir, at sjómaðurin er vorðin sjúkur ella skaddur.

9. Særlige regler om fastlønnede søfolk

§ 35. § 29 om hyre under sygdom, legemsskade eller graviditet og § 33, stk. 3, om efterhyre ved død finder anvendelse, uanset om sømanden gør tjeneste på et af rederiets skibe på det tidspunkt, uarbejdsdygtigheden eller dødsfaldet indtræder. § 30 om pleje og fri rejse og § 34 om begravelsesudgifter m.v. finder tilsvarende anvendelse, forudsat at sygdommen, legemsskaden eller dødsfaldet indtræder under et af rederen beordret ophold uden for sømandens hjemland. Retten til pleje omfatter dog alene pleje uden for hjemlandet i indtil 12 uger efter, at sygdommen eller skaden er indtrådt.

10. Serligar reglur um starvsavtalur hjá skipsyvirmonnum

§ 36. Fyri starvsavtalur hjá skipsyvirmonnum galda frammanfyri standandi reglur við broytingum og ískoytum eftir §§ 37-43.

2. stk. Sum skipsyvirmaður verða at rokna: hovmeistarar, maskinmeistarar, radiotelegrafistar og stýrimenn. 1. stk. og §§ 37-43 galda eisini fyri onnur starvsfólk í samsvarandi leiðandi støvum, sum sett eru av reiðaranum í skipstænastu á skipi.

§ 37. Hvør partur kann siga starvsav-

10. Særlige bestemmelser om skibsofficerers tjenesteaftaler

§ 36. For skibsofficerers tjenesteaftaler gælder de foranstående bestemmelser med de ændringer og tilføjelser, der følger af §§ 37-43.

Stk. 2. Ved skibsofficerer forstås hovmestre, maskinmestre, radiotelegrafister og styrmænd. Stk. 1 og §§ 37-43 finder også anvendelse på andre af rederen til skibstjeneste ansatte funktionærer, der har tilsvarende ledende stillinger.

§ 37. Hver af parterne kan opsige tje-

talunа upp við 3 mánaða freist, uttan so at annað er avtalað.

2. stk. Styttri uppsagnarfreist enn 1 mánaður kann ikki verða avtalað fyri reiðaran í tí fyrsta setanarárinum og 3 mánaðir í teim fylgjandi ánnum. Hetta hevur tó ikki gildi fyri avtalur um avloysarastarv, tá ið starvið ikki varir meir enn 9 mánaðir.

3. stk. Hesar reglur víkja fyri uppsagnarfreistum starvsfelaganna í førum, har lógliga er fráboðaður arbeiðsstoðgur.

nestcaftalen med 3 måneders varsel, medmindre andet følger af aftalen.

Stk. 2. Der kan ikke aftales kortere opsigelsesvarsel for rederen end 1 måned i det første ansættelsesår og 3 måneder i de følgende. Det gælder dog ikke aftale om tjeneste som afløser, forudsat at tjeneste ikke varer ud over 9 måneder.

Stk. 3. Disse bestemmelser viger for organisationers opsigelsesvarsler i tilfælde af lovligt varslet arbejdsstandsning.

§ *38.* Rættur skipsyvirmans at fara úr starvi eftir § 7 er treytaður av, at hann hevur sagt starvið upp við 3 mánaða freist, ella, um styttri freist er avtalað, tá við slíkari.

§ *38.* Skibsofficerens ret til at fratræde tjenesten efter § 7 er betinget af, at han har opsagt tjenesteforholdet med 3 måneders varsel, eller, hvis et kortere varsel er aftalt, da med dette.

§ *39.* Var starvið sagt upp, tá skipsyvirmaðurin gjørdist óarbeiðsførur, ella verður tað sagt upp aftaná, hevur § 29, 2. stk., sbr. § 35, um rætt til sjúkrahýru, eftir at starvið er hildið uppat, bert gildi, um uppsagnarfreistin er úti, áðrenn 2 mánaðir eru gingnir, eftir at hann fór úr starvinum umborð. Rætturin til sjúkrahýru heldur í slíkum førum uppat 2 mánaðir eftir avfaringina. Er skipsyvirmaður vorðin óarbeiðsførur í einum tíðarbili, tá hann ikki var í starvi á einum av skipum reiðarans, verða teir báðir mánaðirnir roknaðir frá teirri stund, hann gjørdist óarbeiðsførur.

§ *39.* Var tjenesteforholdet opsagt, da skibsofficeren blev uarbejdsdygtig, eller opsiges det herefter, finder § 29, stk. 2, jfr. § 35, om ret til sygehyre efter tjenesteforholdets ophør kun anvendelse, hvis opsigelsesfristen udløber, inden 2 måneder er forløbet, efter at han fratrådte tjenesten om bord. Retten til sygehyre ophører i så fald 2 måneder efter fratrædelsen. Er skibsofficeren blevet uarbejdsdygtig på et tidspunkt, da han ikke var i tjeneste på et af rederiets skibe, regnes de 2 måneder fra det tidspunkt, uarbejdsdygtigheden indtrådte.

§ *40.* § 35, sbr. § 39 um rætt til sjúkrahýru v.m. fær gildi, hóast starv skipsyvirmans ikki er knýtt at einum reiðara á tann hátt, at starv hansara hjá reiðaranum heldur fram, sjálvt um

§ *40.* § 35, jfr. § 39, om ret til sygehyre m.v. finder anvendelse, uanset at en skibsofficers tjenesteforhold ikke er knyttet til et rederi, saledes at hans ansættelse hos rederen skal fortsætte,

starvið á tí ciostaka skipinum heldur uppat.

§ *41.* Verður skipsyvirmaður, sum hevur verið í starvi hjá einum reiðara í 12, 15 ella 18 ár út í eitt, uppsagdur, skal reiðarin, tá yvirmaðurin fer av, gjalda honum eina upphædd, sum svarar til ávikavist 1, 2 ella 3 mánaða hýru.
2. stk. 1. stk. fær ikki gildi, um skipsyvirmaðurin, tá hann fer av, fær pensjón frá reiðaranum ella fólkapensjón.
3. stk. 1. stk. hevur eisini gildi, um skipsyvirmaður verður avskeiðaður av órøttum.

§ *42.* Verður skipsyvirmaður uppsagdur, og hevur hesin yvirmaður, tá ið hann verður uppsagdur, havt starv hjá sama reiðara eitt ár ella meira, tá skal hesin sami reiðari samsýna uppsagnina, um ikki nóg góð grund tykist vera undir henni, annaðhvørt hjá yvirmanni ella reiðara. Samsýningin verður sett í mun til starvstíð yvirmansins og eftir umstøðunum annars í málinum, men fer ikki upp um 3 mánaða hýru.
2. stk. Um skipsyvirmaður, tá hann verður uppsagdur, hevur verið hjá sama reiðara í minsta lagi í 10 ár út í eitt, kann endurgjaldið, ið nevnt er í 1. stk., verða upp í 4 mánaða hýra. Aftan á 15 ára samanhangandi starvstíð í reiðarii kann endurgjaldið verða hýra upp í 6 mánaðir.
3. stk. 1. og 2. stk. hava eisini gildi, um skipsyvirmaðurin verður uppsagdur uttan grund.

§ *43.* Verður skipsyvirmaður uppsagd-

selv om tjenesten på det enkelte skib ophører.

§ *41.* Opsiges en skibsofficer, der har haft uafbrudt ansættelse i det pågældende rederi i 12, 15 eller 18 år, skal rederen ved officerens fratrædelse betale et beløb svarende til henholdsvis 1, 2 eller 3 månedors hyre.
Stk. 2. Stk. 1 finder ikke anvendelse, hvis skibsofficeren ved fratrædelsen vil oppebære pension fra rederen eller folkepension.
Stk. 3. Stk. 1 gælder også, hvis skibsofficeren afskediges uberettiget.

§ *42.* Hvis opsigelse af en skibsofficer, som har været uafbrudt beskæftiget i det pågældende rederi i mindst 1 år før opsigelsen, ikke kan anses for rimeligt begrundet i officerens eller rederiets forhold, skal rederen betale en godtgørelse. Denne fastsættes under hensyn til officerens ansættelsestid og sagens øvrige omstændigheder, men kan ikke overstige 3 måneders hyre.
Stk. 2. Såfremt en skibsofficer ved opsigelsen har været uafbrudt beskæftiget i det pågældende rederi i mindst 10 år, kan den godtgørelse, der er nævnt i stk. 1, udgøre indtil 4 måneders hyre. Efter 15 års uafbrudt beskæftigelse i rederiet kan godtgørelsen udgøre indtil 6 måneders hyre.
Stk. 3. Stk. 1 og 2 gælder også, hvis skibsofficeren afskediges uberettiget.

§ *43.* Afskediges en skibsofficer uden

ur uttan tilika grund, sum nevnd er í § 17 um ólýdni v.m. hevur hann rætt til hýru í 3 mánaðir eftir, at starvið er hildið uppat, uttan so at vanligar reglur um endurgjald geva honum rætt til størri upphædd. Annars fær § 18 um rætt til frían ferð og um at fara av, áðrenn uppsagnarfreistin er úti, gildi.

2. stk. Fyri fiskiskip verður uppsagnarhýran roknað samsvarandi partsbýti í sáttmálanum faldað við minstulønini.

sadan grund som nævnt i § 17 om disciplinære forseelser m.v., har han ret til hyre for 3 maneder efter tjenesteforholdets ophør, medmindre almindelige erstatningsregler hjemler ret til et større beløb. I øvrigt finder § 18 om ret til fri rejse og om fratrædelse før opsigelsesfristens udløb anvendelse.

Stk. 2. For fiskeskibe beregnes opsigelseshyren i henhold til partsfordelingen i overenskomsten multipliceret med mindstelønnen.

11. Starvsavtala skiparans

11. Skibsførerens tjenesteaftale

§ *44.* Reiðarin skal siggja til, at skrivlig avtala við skiparan um setanartreytirnar verður gjørd. Í avtaluna skal verða sett, hvat avtalað er um avfaringarstað og uppsagnarfreist.

§ *44.* Rederen skal sørge for, at der oprettes skriftlig aftale med skibsføreren om ansættelsesvilkårene. I aftalen skal anføres, hvad der er aftalt om fratrædelsessted og opsigelsesfrist.

§ *45.* Reiðarin hevur eina og hvørja tíð rætt til at koyra skiparan úr starvi.

2. stk. Verður skiparin avkoyrdur fyri ódugnaskap, órøkt ella grov ella ofta afturvendandi mistøk ella vansketni í starvinum, eigur hann ikki hýru í longri tíð, enn hann hevur starvast.

3. stk. Annars verða § 37 um, nær starv eftir uppsøgn heldur uppat, og §§ 39-43 um rætt til hýru v.m. nýttar.

§ *45.* Rederen kan til enhver tid afskedige skibsføreren.

Stk. 2. Afskediges skibsføreren på grund af uduelighed, uredelighed eller grov eller oftere gentagen fejl eller forsømmelse i tjenesten, tilkommer der ham ikke hyre for længere tid, end han har gjort tjeneste.

Stk. 3. I øvrigt finder § 37 om tjenesteforholdets ophør ved opsigelse og §§ 39-43 om ret til hyre m.v. anvendelse.

§ *46.* Fer skipið fyri einki av sjóskaða, ella verður tað hildið ikki afturgerandi eftir sjóskaðan, tá heldur starv skiparans uppat, um ikki annað er avtalað. Móti hýru og uppihaldi hevur hann tó skyldu til at vera hjástaddur og at skipa fyri tiltøkum viðvíkjandi farmi og teimum, sum við eru.

§ *46.* Går skibet tabt ved søulykke, eller anses det efter søulykke for uistandsætteligt, ophører skibsførerens tjenesteforhold, hvis ikke andet følger af aftalen. Mod hyre og underhold skal han dog blive på stedet og sørge for ordningen af de anliggender, som vedrørende skibet, de ombordværende eller lasten.

2. stk. § 19, 2. og 3. stk., verða nýttar samsvarandi.

§ *47.* Fyri skiparan galda við neyðugum frávikum:

1) § 4, 2. stk., um læknakanning,
2) § 6, 1. stk., avfaringarstað,
3) § 7, sbr. § 39, um ikki annað er avtalað,
4) § 8 um fría heimferð eftir 6 mánaða starvstíð,
5) § 10, 1. stk., um rætt til at krevja at sleppa av, tá ið hjúnafelagi er deyður ella barn deytt, ella tey eru illa sjúk, og umstøðurnar eru slíkar, at tað ber til hjá skipsføraranum at fara av
6) § 14, 1. stk., sbr. 3. stk., um rætt til at krevja at sleppa av, um skipið missir rættin til at hava føroyskt flagg,
7) § 16, 1. stk., nr. 4, sbr. 3. stk., um at sleppa av í sambandi við læknakanning,
8) § 21, um frá hvørjum degi hýran gongur, og nær hon heldur uppat,
9) § 22, 3. stk. um hýruna, tá ferðin gerst styttri enn ætlað,
10) § 33 um hýruna, tá viðkomandi doyr, ella skipið gongur burtur,
11) §§ 29 og 30, sbr. §§ 35, 39 og 40, um hýru, røkt og fría ferð vegna sjúku ella likamsskaða,
12) § 31 um rætt reiðarans at fáa ávísar útreiðslur endurgoldnar av tí almenna,
13) §§ 32 og 34 um jarðarferð ella líkbrenning og um, hvat skal vera gjørt við tað, ið eftir liggur,
14) § 33, 3. stk., sbr. §§ 35 og 40, um eftirsitihýru og

Stk. 2. § 19, stk. 2 og 3, finder tilsvarende anvendelse.

§ *47.* For skibsføreren gælder med de fornødne lempelser:

1) § 4, stk. 2, om lægeundersøgelse,
2) § 6, stk. 1, om fratrædelsessted,
3) § 7, jfr. § 39, hvis ikke andet er aftalt,
4) § 8 om fri hjemrejse efter 6 maneders tjeneste,
5) § 10, stk. 1, om ret til at kræve afsked i tilfælde af, at hans ægtefælle eller barn er afgået ved døden eller er alvorligt syg og omstændighederne tillader, at skibsføreren kan fratræde,
6) § 14, stk. 1, jfr. stk. 3, om ret til at kræve afsked, hvis skibet mister retten til at føre færøsk flag
7) § 16, stk. 1, nr. 4, jfr. stk. 3, om afsked i forbindelse med lægeundersøgelse,
8) § 21 om, fra hvilken dag hyren løber, og hvornår den standser,
9) § 22, stk. 3, om hyre, når rejsen varer kortere tid end beregnet,
10) § 33 om hyren, da den pågældende dør, eller skibet går ned.
11) §§ 29 og 30, jfr. §§ 35, 39 og 40, om hyre, pleje og fri rejse i tilfælde af sygdom eller legemsskade,
12) § 31 om rederens adgang til af landet at få erstattet visse udgifter,
13) §§ 32 og 34 om begravelse eller ligbrænding og om behandling af efterladenskaber,
14) § 33, stk. 3, jfr. §§ 35 og 40, om efterhyre ved død og

15) § 59 um endurgjald fyri mistar ognarlutir.

§ 48. Er avtalað, at skiparin hevur rætt til lut í farmagjaldi skipsins (kaplak) ella í aðrari inntøku av túrinum, her uppií endurgjald fyri yvirliggitíð, ella part í úrtøku reiðarans (tantieme), skal reiðarin gjalda lutvísan part av avtaladu samsýningini, um starvið heldur uppat, áðrenn ferðin er endað, ella roknskaparráðið er runnið.

2. stk. Hevur skiparin rætt til hýru fyri longri tíð, enn hann hevur starvast, verða tær samsýningar, sum nevndar eru í 1. stk. og verða goldnar fyri tíðina eftir, at starvið er hildið uppat, settar til sama, sum tað dupulta av hýruni hjá ovasta stýrimanninum fer upp um føstu hýruna hjá skiparanum.

15) § 59 om erstatning for tab af ejendele.

§ 48. Er det aftalt, at skibsføreren har ret til andel i skibets fragt (kaplak) eller i anden indtægt af rejsen, herunder godtgørelse for overliggetid, eller andel i rederens overskud (tantieme), skal rederen betale en forholdsmæssig del af den aftalte ydelse, hvis tjenesteforholdet ophører før rejsens slutning eller regnskabsårets udløb.

Stk. 2. Har skibsføreren ret til hyre for længere tid, end han har været i tjenesten, betales de ydelser, som er nævnt i stk. 1, for tiden efter tjenesteforholdets ophør med det beløb, hvormed det dobbelte af øverste styrmands hyre overstiger skibsførerens faste hyre.

Kapitel III

Skipstænastan

1. Leiðslan av arbeiðinum umborð

§ 49. Skiparin hevur hægsta ræði umborð.

2. stk. Berst skiparanum frá, ella hann er ikki hjástaddur, tekur ovasti stýrimaðurin í hansara stað avgerðir, sum tað ikki ber til at bíða við, tá ið skiparin ikki hevur skipað øðrvísi fyri.

3. stk. Doyr skiparin, ella gerst hann av sjúku ella aðrari tvingandi orsøk ikki førur fyri at føra skipið, ella fer hann úr starvinum, kemur ovasti stýrimaður í hansara stað, til nýggjur førari er komin. Í slíkum førum skal beinanvegin verða boðað reiðaranum frá.

Kapitel III

Skibstjenesten

1. Ledelsen af arbejdet om bord

§ 49. Skibsføreren har den højeste myndighed om bord.

Stk. 2. Under skibsførerens forfald eller fravær træffer den øverste styrmand i tilfælde, hvor forskrift ikke er givet af skibsføreren, i hans sted afgørelse, som ikke kan udsættes.

Stk. 3. Dør skibsføreren, eller bliver han på grund af sygdom eller anden tvingende årsag ude af stand til at føre skibet, eller forlader han tjenesten, træder den øverste styrmand i hans sted, indtil ny fører er tiltrådt. Rederen skal i disse tilfælde straks underrettes.

§ *50.* Tá arbeiðið verður skift sundur, skal verða gingið eftir, hvat starv hvør einstakur eigur umborð, og helst soleiðis, at yrkisdúgleikin hjá hvørjum einsæris fær frama.
2. stk. Føroya Landsstýri fer eftir ummæli frá sjóvinnuráðnum við atliti til trygdina á sjónum neyðugar reglur um ábyrgdarøki hjá skipsyvirmonnum og øðrum, sum hava fyristøðustarv umborð.

§ 50. Ved fordelingen af arbejdet skal der tages hensyn til hver enkelts stilling om bord og så vidt muligt til hans faglige dygtiggørelse.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter efter indhentet udtalelse fra Søfartsrådet af hensyn til sikkerheden til søs nødvendige bestemmelser om ansvarsområdet for skibsofficerer og andre, der har ledende stillinger om bord.

2. Vanligar tænastuskyldur

§ *51.* Sjómaður skal vera boðum, hann fær í starvinum, lýðin og skal við skiligum aftursvari vísa, at hann hevur skilt tey. Hann skal haraftrat fylgja teim forskriftum, sum givnar verða fyri at halda skil umborð.
2. stk. Verður sjómaður tarnaður at koma umborð rættstundis, skal hann beinanvegin siga skipsranum frá.
3. stk. Sjómaður skal endurgjalda tann skaða, hann ger mistøk ella vanrøkt í starvi sínum.

2. Almindelige tjenestepligter

§ *51.* En sømand skal efterkomme ordrer, han modtager i tjenesten, og skal ved tydeligt svar tilkendegive, at han har forstået disse. Han skal endvidere følge de forskrifter, der gives for ordenen om bord.
Stk. 2. Bliver en sømand forhindret i at komme om bord i rette tid, skal han straks underrette skibsføreren.
Stk. 3. Sømanden skal erstatte den skade, han forvolder ved fejl eller forsømmelse i tjenesten.

3. Verja móti vanlukkum og heilsuskaðum

§ *52.* Tann, sum hevur leiðsluna umborð, skal síggja til, at sjómaðurin er nóg væl vardur móti vanlukkum og heilsuskaðiligari ávirkan. Við leiðbeining og eftirliti skal hann tryggja, at arbeiðið fer fram á fulltryggan hátt fyri vanlukku- og heilsuvanda.
2. stk. Sjómaðurin skal gera sítt til, at tey tiltøk, sum gjørd eru at tryggja ímóti vanlukkum ella skaðiligum

3. Værn mod ulykker og sundhedsfare

§ *52.* Den, der leder arbejdet, skal sørge for, at sømanden er tilstrækkeligt beskyttet mod ulykkestilfælde og sundhedsfarlig påvirkning. Han skal ved instruktion og tilsyn sikre, at arbejdet udføres på forsvarlig måde under hensyn til ulykkes- og sundhedsrisikoen.
Stk. 2. Sømanden skal medvirke til, at de foranstaltninger, der er truffet for at sikre mod ulykker eller skadelige

ávirkanum, ganga eftir ætlan, og skal hann í øllum vísa neyðugt varsemi.
3. stk. Avvarðandi myndugleiki ásetir reglur um fyribyrgjan av og verju ímóti sjúkra- og vanlukkuvandum umborð.

påvirkninger, virker efter deres hensigt, og han skal i det hele udvise fornøden forsigtighed.
Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler til forebyggelse af og beskyttelse mod sygdoms- og ulykkesfarer om bord.

4. Kostur og heilsuumstøður

§ *53.* Skiparin skal siggja til, at manningin fær góðan og nóg nógvan kost. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um hetta eftir umnæli frá sjóvinnuráðnum.
2. stk. Um skiparin heldur tað vera neyðugt at minka um kostin á túrinum, hevur manningin krav um endurgjald.
3. stk. Skiparin má ikki fyri sína rokning halda manningina við kosti.
4. stk. Skiparin skal hava eftirlit við heilsuviðurskiftunum og reinførinum umborð. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um hetta.

4. Kost og sundhedsforhold

§ *53.* Skibsføreren skal sørge for, at mandskabet får god og tilstrækkelig kost. Landsstyret kan fastsætte regler herom efter indhentet udtalelse fra søfartsrådet.
Stk. 2. Hvis skibsføreren anser det for nødvendigt at formindske kosten under rejsen, har mandskabet krav på erstatning.
Stk. 3. Skibsføreren må ikke for egen regning påtage sig mandskabets forplejning.
Stk. 4. Skibsføreren skal føre tilsyn med sundhedsforholdene og renligheden om bord. Landsstyret kan fastsætte regler herom.

5. Sjódyggleikasýn

§ *54.* Um meir enn helvtin av manningini klagar um sjódyggleika skipsins til túrin, ið stendur fyri framman, skal skiparin lata skipið sýna eftir reglunum í lóg um skipatrygd v.m. Í fremmandari havn, har sýn eftir hesum reglum ikki kann verða gjørt, skal skiparin venda sær til avvarðandi myndugleika á staðnum við áheitan um at tilnevna eftirlitsmenn.

5. Sødygtighedssyn

§ *54.* Hvis over halvdelen af mandskabet klager over skibets sødygtighed til den forestående rejse, skal skibsføreren lade afholde kontrolsyn efter reglerne i lov om tilsyn med skibe[1]. I fremmed havn, hvor kontrolsyn efter disse regler ikke kan afholdes, skal skibsføreren henvende sig til vedkommende stedlige myndighed med anmodning om udmeldelse af synsmænd.

2. stk. Sama er galdandi, um maskinstjórin ella ovasti stýrimaður setur fram tílíka klagu um tað av skipinum, tess útbúnað ella útgerð, sum hann hevur eftirlit við.

3. stk. Kemur tað við eftirliti fram, at klagan hevur ikki havt rímiliga grund, verður peningamissur at bøta aftur eftir § 53, 3. stk.

4. stk. Verður sýnað eftir 1. og 2. stk. í útlandinum, skal tann danski konsulin á staðnum, um málið hevur verið lagt fyri hann, og annars skiparin, beinanvegin senda frágreiðing til Føroya Landsstýri.

Stk. 2. Det samme gælder, hvis maskinchefen eller den øverste styrmand fremsætter tilsvarende klage med hensyn til de dele af skibet, dets tilbehør eller udrustning, som han har tilsyn med.

Stk. 3. Viser det sig ved synet, at klagen har savnet rimelig grund, erstattes tabet efter § 53, stk. 3.

Stk. 4. Afholdes syn efter stk. 1 og 2 i udlandet, skal den stedlige danske konsul, hvis sagen har været forelagt ham, og eller skibsføreren, straks indsende beretning til landsstyret.

6. Hvíld v.m.

§ *55.* Sjómaður skal hava neyðuga tíð til hvíld og svøvn. Fyri hvørt samdøgur skal hvílitíðin vera í minsta lagi 10 tímar, og skal samanhangandi hvílitíðin ikki vera styttri enn 4 tímar. Tíðarbilið ímillum tvær hvíliløtur má ikki fara upp um 14 tímar. Um skiparin heldur tað trygdarliga ber til, kann tó verða gingið frá hesi reglu, tá komið verður í ella farið verður úr havn.

2. stk. Manningin á fiskiskipum hevur, tá ið viðurskiftini ikki gera tað ógjørligt, rætt til 8 tíma hvíld um samdøgrið, soleiðis at 6 tímar av hesi hvíld verða óbrotnir. Á trolarum eigur manningin tó rætt til 6 tíma vaktarskifti. Undantak kann í einstøkum førum verða gjørt, tá ið meirilutin av manningini kemur ásamt við skiparan um hetta.

6. Hviletid m.v.

§ *55.* En sømand skal have fornøden tid til hvile og søvn. Inden for hvert døgn skal hviletiden mindst være på 10 timer, der kan deles i højst to perioder hver på mindst 4 timer. Tiden mellem to på hinanden følgende hvileperioder må ikke overstige 14 timer. Såfremt skibsføreren finder det sikkerhedsmæssigt forsvarligt, kan bestemmelsen dog fraviges ved ankomst til eller afgang fra havn.

Stk. 2. Mandskabet ombord på fiskeskibe har, forsåvidt omstændighederne ikke umuliggør dette, ret til 8 timers hviletid i døgnet, således at 6 timer af denne hviletid er sammenhængende. Ombord i trawlere har mandskabet dog ret til 6 timers vagtskifte. Undtagelse kan i særlige tilfælde gøres, hvis flertallet af mandskabet bliver enig med skibsføreren om dette.

2. stk. Sunnu- og halgidagar má arbeiði ikki verða álagt sjómanni, tá ið tað ber til at bíða við tí.
3. stk. Sunnu- og halgidagar eigur í mesta mun at verða givið hvørjum tí sjómanni, sum vil tað, hevi til at halda gudstænastu umborð ótarnaður.

Stk. 2. På søn- og helligdage må der ikke pålægges en sømand arbejde, som kan udsættes.
Stk. 3. På søn- og helligdage bør der endvidere så vidt muligt gives enhver sømand, som ønsker det, lejlighed til uforstyrret at holde gudstjeneste om bord.

7. Rættur sjómans at fara í land í frítíðini

§ 56. Sjómaður hevur, meðan skipið er í havn ella á tryggum akkersplássi, rætt til at fara í land í frítíð síni, uttan so at tað er neyðugt, at hann verður verandi umborð fyri tryggleika skipsins, teirra umborð ella farmsins, til at gera neyðugt skipsarbeiði, ella tí at skipið skal fara ella verða flutt.
2. stk. Skiparin skal, um tað, tá ið hugsað verður um útreiðslur og aðrar umstøður, er rímiligt, útvega manningini bát í land og tað ókeypis.

7. Sømandens ret til at gå i land i fritiden

§ 56. En sømand har under skibets ophold i havn eller på sikker ankerplads ret til at gå i land i sin fritid, medmindre det er nødvendigt, at han bliver om bord af hensyn til skibets, de øvrige ombordværendes eller ladningens sikkerhed, udførelse af nødvendigt skibsarbejde eller skibets forestående afrejse eller forhaling.
Stk. 2. Skibsføreren skal, hvis det under hensyn til omkostningerne og andre omstændigheder er rimeligt, uden udgift for mandskabet sørge for bådforbindelse med land.

8. Ognarlutir sjómans o.a.

§ 57. Sjómaður kann hava viðføri til persónliga nýtslu í hóskiligari nøgd, um hetta ikki er til bága fyri skipið ella farmin ella vandan fyri óskili umborð. Uttan loyvi skiparans má hann ikki taka vøru við til sølu fyri egna ella annars rokning.
2. stk. Sjómaður skal rinda farmagjald fyri góðs, sum ólógliga er tikið umborð. § 51, 3. stk., fær gildi, um skaði stendst av góðsinum.

8. Sømandens ejendele m.m.

§ 57. En sømand kan medtage ting til personlig brug i rimelig omfang, hvis det ikke kan medføre ulempe for skib eller ladning eller fare for uorden om bord. Uden skibsførerens tilladelse må han ikke medtage varer til salg for egen eller andres regning.
Stk. 2. Sømanden skal betale fragt for ulovligt medtaget gods. § 51, stk. 3, finder anvendelse, hvis godset forvolder skade.

3. stk. Ikki er loyvt at taka narkotika ella onnur skaðilig eiturevni við umborð. Uttan loyvi skiparans kunnu vápn ella lóður ikki verða tikin við umborð.

4. stk. Skiparin kann, um hann hevur grund til illtanka um, at okkurt er tikið við umborð ólógliga, lata tilhaldsrúm sjómansins kanna. Sjómaðurin, ella, um hann ikki er til staðar, tá annað vitni, skal vera við, tá kanningin fer fram.

5. stk. Tað, sum er ólógliga tikið við umborð, kann skiparin taka í varðveitslu, fáa í land ella um neyðugt gera til einkis.

Stk. 3. Det er ikke tilladet at bringe narkotika eller andre farlige giftstoffer ombord. Uden skibsførerens tilladelse må våben eller ammunition ikke medtages om bord.

Stk. 4. Skibsføreren kan, hvis han har begrundet mistanke om, at noget ulovligt er bragt om bord, lade sømandens opholdsrum undersøge. Sømanden har ret til at være til stede ved undersøgelsen.

Stk. 5. Hvad der ulovligt er medtaget, kan skibsføreren tage i forvaring, lade bringe i land eller om nødvendigt tilintetgøre.

§ *58.* Eru ognarlutir hjá sjómanni eftir umborð, tá hann er farin úr starvi, skulu hesir verða goymdir umborð fyri hansara rokning. Skiparin skal sum skjótast syrgja fyri, at yvirlit yvir teir lutir, ið eftir liggja, verður gjørt. At yvirlitið er rætt, skal verða váttað av tveimum fólkum.

2. stk. Ber ikki so væl til at goyma lutirnar vegna snið teirra, útreiðslurnar ella aðrar umstøður, kunnu teir verða seldir á tryggan hátt. Sama er galdandi, um sjómaðurin hevur ikki vent sær til reiðaran eftir ognarlutunum innan 1 ár.

§ *58.* Efterlader en sømand ejendele om bord ved tjenesteforholdets ophør, skal disse opbevares for hans regning om bord. Skibsføreren skal snarest muligt lade optage en fortegnelse over de efterladte ejendele. Fortegnelsens rigtighed skal bekræftes af to personer.

Stk. 2. Er opbevaring ikke rimelig på grund af ejendelenes beskaffenhed, omkostningerne eller andre omstændigheder, kan de sælges på forsvarlig måde. Det samme gælder, hvis sømanden ikke inden 1 år har henvendt sig til rederen for at få ejendelene udleveret.

§ *59.* Hevur sjómaður mist ognarlutir umborð, ella eru teir skaddir av skipbroti, sjóráni, eldi ella øðrum sjóskaða, skal reiðarin veita endurgjald. Føroya Landsstýri ásetir gjøllari reglur um hetta. Kostnaður av heimferðarklæðum sambært § 19, 2. stk., kann verða drigin frá.

§ *59.* Har en sømand mistet eller fået beskadiget ombordværende ejendele ved forlis, sørøveri, brand eller andet havari, skal rederen betale erstatning. Landsstyret fastsætter nærmere regler herom. Fradrag kan gøres for beklædning, sømanden har modtaget i henhold til § 19, stk. 2.

9. Viðurskiftini umborð

§ *60.* Skiparin kann taka tað til ráða, sum neyðugt er til at halda skil umborð í skipinum.
2. stk. Er skipið í vanda, er uppreistur í manningini ella onnur neyðstøða, kann skiparin gera tað, ið neyðugt og ráðiligt er fyri at fáa skil á aftur. Hvør einstakur av manningini skal veita hjálp, eisini sjálvboðin.
3. stk. Verður tann, ið noktar at gera sítt til at halda skil umborð, fyri skaða, kann skaddi seta fram krav um ábyrgslu, um harðari er fram farið, enn neyðugt var eftir umstøðunum.

§ *61.* Verður grovt brotsverk framt umborð, og skipið er ikki í føroyskari havn, skal skiparin so skjótt sum til ber taka upp eina fyribils frágreiðing, sum verður ført í skipsdagbókina. Hetta er tó ikki galdandi, um brotsverkið er framt á fremmandum landøki, og myndugleikarnir á staðnum fylgja málinum.
2. stk. Skiparin skal í mesta mun syrgja fyri, at sekur ikki rýmir, til danskur konsul ella løgreglan í Føroyum kann taka sær av málinum. Skiparin kann í hesi ætlan taka til neyðug ráð, men má ikki nýta harðari ráð, enn endamálið er til.

Kapittul IV

Ósemja um starvsviðurskifti

§ *62.* Sjómaður kann leggja uppgerð skiparans fyri sjóvinnufyrisitingina.

9. Ordenen om bord

§ *60.* Skibsføreren kan foretage de foranstaltninger, der er nødvendige for at opretholde ordenen om bord.
Stk. 2. Er skibet i fare, er der mytteri blandt mandskabet, eller foreligger anden nødstilstand, kan skibsføreren bruge de midler, der er nødvendige og forsvarlige for at tilvejebringe orden. Enhver af mandskabet skal yde hjælp, også uden opfordring.
Stk. 3. Bliver den, der nægter at medvirke til opretholdelse af orden om bord, tilføjet skade, kan han gøre ansvar gældende, hvis hårdere midler er anvendt, end omstændighederne krævede.

§ *61.* Begås en grovere forbrydelse om bord, og skibet ikke er i færøsk havn, skal skibsføreren snarest muligt optage en foreløbig forklaring, der indføres i skibsdagbogen. Dette gælder dog ikke, hvis forbrydelsen er begået på fremmed territorium og forfølges af stedets myndigheder.
Stk. 2. Skibsføreren skal så vidt muligt sørge for, at en skyldig ikke undviger, indtil dansk konsul eller politiet på Færøerne kan tage sig af sagen. Skibsføreren kan i dette øjemed anvende nødvendige midler, men må ikke bruge strengere midler, end formålet kræver.

Kapitel IV

Tvist om tjenesteforholdet

§ 62. En sømand kan indbringe skibsførerens afregning for søfartsadministrationen.

Kapittul V

Revsifyriskipanir

§ *63.* Misrøkir reiðarin skyldur sínar eftir § 3, 1. stk., sbr. 3. og 4. stk., § 44 og § 47, nr. 1, verður hann sektaður.

§ *64.* Uttan so at hægri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður skiparin revsaður ella tann, ið komin er í hansara stað,

1) við sekt ella hefti, um hann
   a) við vilja ella grovum ósketni tekur til meiri maktráð, enn loyvt er, eftir §§ 60 og 61, 2. stk., ella
   b) misrøkir skyldur sínar eftir § 12, 2. og 3. stk., §§ 27 og 53,
2) við sekt, um hann
   a) setir nakran í arbeiði ímóti §§ 4 ella 55 ella
   b) misrøkir skyldur sínar eftir § 3, 2. stk., 2. pkt., sbr. 3. og 4. stk., § 32, § 52, 1. stk., § 54, 1. og 2. og 4. stk., § 58 og § 72.

§ *65.* Uttan so at hægri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður sjómaðurin revsaður við sekt, um hann

1) misrøkir skyldur sínar eftir § 51, 1. stk., § 52, 1. og 2. stk., og § 60, 2. stk., 2. pkt.,
2) ímóti betri vitan setir fram ella tekur lut í klagu sum nevndari í § 54, og eftirlittsýn stendst av hesum.

2. stk. Brot á 1. stk. verður ikki ákært, uttan reiðarin ella skiparin biðja um tað. Hetta er tó ikki galdandi fyri brot á § 52, 1. og 2. stk.

Kapitel V

Straffebestemmelser

§ *63.* Tilsidesætter rederen sine pligter efter § 3, stk. 1, jfr. stk. 3 og 4, § 44 og § 47, nr. 1, straffes han med bøde.

§ *64.* Medmindre højere straf er forskyldt efter anden lovgivning, straffes skibsføreren eller den, der er trådt i skibsførerens sted,

1) med bøde eller hæfte, hvis han
   a) forsætligt eller groft uagtsomt anvender videregående magtmidler end tilladt efter §§ 60 og 61, stk. 2, eller
   b) tilsidesætter sine pligter efter § 12, stk. 2 og 3, §§ 27 og 53,
2) med bøde, hvis han
   a) anvender nogen til arbejde i strid med §§ 4 eller 55 eller
   b) tilsidesætter sine pligter efter § 3, stk. 2, 2. pkt., jfr. stk. 3 og 4, § 32, § 52, stk. 1, § 54, stk. 1, 2 og 4, § 58 og § 72.

§ *65.* Medmindre højere straf er forskyldt efter anden lovgivning, straffes sømanden med bøde, hvis han

1) tilsidesætter sine pligter efter § 51, stk. 1, § 52, stk. 1 og 2, og § 60, stk. 2, 2. pkt.
2) mod bedre vidende fremsætter eller deltager i klage som nævnt i § 54, og kontrolsyn foranlediges derved.

Stk. 2. Overtrædelse af stk. 1 påtales kun, når rederen eller skibsføreren anmoder herom. Dette gælder dog ikke for overtrædelser af § 52, stk. 1 og 2.

§ 66. Veldur sjómaður av grovum vansketni ella grovari vanrøkt í starvinum, at skip fer á land, ella annað skipbrot, verður hann revsaður við sekt ella hefti, um maðurin er ikki sekur til meiri revsingar eftir aðrari lóg. Sama er galdandi, um sjómaður aftur og aftur av mistøkum ella vanrøkt veldur slíkan tilburð.

2. stk. Hevur sjómaður, sum ger arbeiði umborð á skipi í starvi, sum hevur veruligan týdning fyri trygdina, fingið sær spiritus ella onnur rúsevni í slíkari nøgd, at hann er ikki førur fyri at røkja starv sítt á fulltryggan hátt, verður hann revsaður við sekt ella hefti, er hann ikki sekur til meiri revsingar eftir aðrari lóggávu.

3. stk. Fyri skiparan eru reglurnar í § 371 í sjólógini galdandi.

§ 66. Foranlediger en sømand grundstødning, forlis eller anden soutykke ved grov fejl eller grov forsømmelse i tjenesten, straffes han med bøde eller hæfte, medmindre højere straf er forskyldt efter anden lovgivning. Det samme gælder, dersom en sømand gentagne gange ved fejl eller forsømmelse foranlediger en sådan begivenhed.

Stk. 2. Har en sømand, der udfører arbejde om bord i et skib i en stilling af væsentlig betydning for sikkerheden, nydt spiritus eller andre rusmidler i et sådant omfang, at han er ude af stand til at udføre sin tjeneste på fuldt betryggende måde, straffes han med bøde eller hæfte, medmindre højere straf er forskyldt efter anden lovgivning.

Stk. 3. For skibsføreren gælder sølovens § 371.

§ 67. Við sekt ella hefti verður … um revsingin verður ikki meiri eftir aðrari lóg — tann revsaður, sum av fyrisettum ráði dregst undan starvi sínum við ikki at koma rættstundis umborð ella fer av skipinum, um hann visti ella átti at vitað, at rýmingin fór at seta mannalív ella skip í váða.

§ 67. Medmindre højere straf er forskyldt efter anden lovgivning, straffes med bøde eller hæfte den, der med forsæt til at unddrage sig tjenesten undlader at indfinde sig om bord i rette tid eller forlader skibet, hvis han indså eller burde indse, at rømning ville medføre fare for menneskeliv eller skibet.

§ 68. Í reglum, sum gjørdar verða sambært § 4, 2. og 3. stk., og § 52, 3. stk., kann revsing av sekt verða fyrisett.

§ 68. I regler, der udstedes i medfør af § 4, stk. 2 og 3, og § 52, stk. 3, kan der fastsættes straf med bøde.

§ 69. Verður skipari við dómi funnin sekur í broti á § 64, nr. 1, litra a ella b, ella skipsyvirmaður í broti á § 66, 1. og 2. stk., kann undir tyngjandi umstøðum ræturin at starvast sum skipari, stýrimaður ella maskinmeistari í dóminum verða tikin frá honum í ávíst tíðarskeið upp í 5 ár ella við alla.

§ 69. Findes ved dom en skibsfører skyldig i overtrædelse af § 64, nr. 1, litra a eller b, eller en skibsofficer i overtrædelse af § 66, stk. 1 og 2, kan under skærpende omstændigheder retten til at gøre tjeneste som skibsfører, styrmand eller maskinmester ved dommen frakendes for et bestemt tidsrum

Ákærumyndugleikin sendir, um so er, sjóvinnubrævv hansara og úrrit av dóminum til Føroya Landsstýri. Føroya Landsstýri kann, tá 5 ár eru liðin eftir endaligan dóm, geva tann frátikna rættin aftur.

2. stk. Verður rætturin at starvast sum skipari, stýrimaður ella maskinmeistari eftir 1. stk. tikin, verður í dóminum avgjørt, um ávikavist skiparin kann starvast sum stýrimaður, ella um stýrimaðurin ella maskinmeistarin kunnu vera í starvi á lægri stigi. Um so er, fráboðar Føroya Landsstýri nevðugt sjóvinnubrævv. Lutvís frátøka verður tó ikki, tá brot er framt á § 66, 2. stk.

3. stk. Heldur løgreglan, tá brot verða gjørd á § 68, 2. stk., at treytirnar fyri at taka rættin frá manni at starvast sum stýrimaður ella maskinmeistari eru til staðar, kann hon taka henda rætt frá honum fyribils, tó soleiðis, at avvarðandi dómari, áðrenn málið verður endaliga avgjørt í dóminum, kann seta avgerðina hjá løgregluni úr gildi. Fellur á 1. rættarstigi dómur um fríkenning, og dómurin av ákæruvaldinum verður skotin inn fyri hægri dómstól, kann ákæruvaldið, tá ið tað tykist serliga umráðandi, at frátøkan av rættinum til at starvast sum stýrimaður ella maskinmeistari undir kæruni stendur við makt, leggja málið fyri hendan dómstól, sum tekur avgerð við úrskurði.

indtil 5 år eller for bestandig. Anklagemyndigheden indsender i så fald hans sønæringsbevis og udskrift af dommen til landsstyret. Landsstyret kan, når 5 år er forløbet efter endelig dom, tilbagegive den frakendte ret.

Stk. 2. Frakendes en skibsfører, styrmand eller maskinmester efter stk. 1 retten til at gøre tjeneste, bestemmes det ved dommen, henholdsvis om skibsføreren kan gøre tjeneste som styrmand, og om styrmanden eller maskinmesteren kan gøre tjeneste i stilling af lavere grad. Landsstyret meddeler ham i så fald fornødent sønæringsbevis. Delvis frakendelse kan dog ikke finde sted ved overtrædelser efter § 66, stk. 2.

Stk. 3. Skønner politiet ved overtrædelser efter § 68, stk. 2, at betingelserne for at frakende en person retten til at gøre tjeneste som styrmand eller maskinmester foreligger, kan det midlertidigt fratage ham denne ret, dog at vedkommende dommer, inden spørgsmålet endeligt afgøres ved dommen, kan ophæve den af politiet trufne bestemmelse. Afsiges der frifindende dom i 1. instans, og dommen påankes af anklagemyndigheden, kan denne, hvor forholdene særligt taler for at opretholde fratagelsen af retten til at gøre tjeneste som styrmand eller maskinmester under anken, indbringe spørgsmålet for appelinstansen, der træffer afgørelse ved kendelse.

Kapittul VI

Serstakar reglur

§ *70.* Føroya Landsstýri kann áseta reglur um, at § 8 um fría heimferð við uppihaldi eftir ávísa tíð í starvi, § 9 um rættin hjá tí, sum er við barn, til fría heimferð fyri rokning landsins og § 30 um rættin hjá tí sjúka sjónamanninum til fría ferð skal verða galdandi fyri sjómenn, sum ikki hava bústað í Føroyum.

§ *71.* Føroya Landsstýri kann áseta gjøllari reglur um tey rættindi viðvíkjandi røkt hjá sjúkum og skaddum, fríari ferð við uppihaldi í ávísum førum, heimsending av hýrupeningi fyri rokning landsins og ábyrgd og fyri jarðarferð ella líkbrenning, sum henda lóg ásetir.

2. stk. Føroya Landsstýri ásetir reglur um útflýggjan og nýtslu av siglingarbókum, mynstringarbrøvum og manningartalvum.

3. stk. Í siglingarbókini ella mynstringarbrævi má eingin viðmerking um háttalag sjómansins í starvinum ella um revsing, hann hevur fingið, verða sett.

§ *72.* Skiparin skal syrgja fyri, at eitt eintak av lógini og teim reglum, sum gjørdar eru sambært hesi, eru umborð og eru atkomilig hjá manningini.

2. stk. Er hýrað eftir lønarsáttmála, skal hann syrgja fyri, at eitt eintak av honum er umborð atkomiligt hjá manningini.

Kapitel VI

Særlige bestemmelser

§ *70.* Landsstyret kan fastsætte regler om, at § 8 om fri hjemrejse med underhold efter en vis tids tjeneste, § 9 om den gravides ret til fri hjemrejse for statens regning og § 30 om den syge sømands ret til fri rejse skal gælde for sømænd, der ikke har bopæl i Danmark.

§ *71.* Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om sådan ret til pleje i tilfælde af sygdom eller tilskadekomst, til fri rejse med underhold i visse tilfælde og til hjemsendelse af hyremidler på landets regning og risiko samt om sådan pligt til at sørge for begravelse eller ligbrænding, som denne lov fastslår.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter regler om udstedelse og brugen af søfartsbøger, mønstringsbeviser og bemandingsskemaer.

Stk. 3. I søfartsbogen eller mønstringsbeviset må ikke gøres nogen bemærkning om sømandens forhold i tjenesten eller om nogen han overgået straffedom.

§ *72.* Skibsføreren skal sørge for, at et eksemplar af loven og de regler, der er udstedt i medfør af denne, findes om bord og er tilgængeligt for mandskabet.

Stk. 2. Er forhyring sket i henhold til tarifaftale, skal han sørge for, at et eksemplar af denne findes om bord tilgængeligt for mandskabet.

§ 73. § 13, § 21, 1. stk., § 26, § 29, 2. stk., § 35, § 37, § 39, § 40, § 41, § 42, § 43 og § 48 eru ikki galdandi fyri fiskiskip.

§ 74. Føroya Landsstýri kann áseta reglur, sum víkja frá hesari lóg fyri skip, sum ikki hava skyldu at verða skrásett, og fyri skip til annað ávist endamál.

§ 75. Føroya Landsstýri ásetir, nær henda lóg kemur í gildi. Samstundis fara úr gildi løgtingslog nr. 57 frá 3. november 1967 um sjómenn og lóg nr. 5 frá 28. februar 1956 um hvíldartíð á føroyskum fiskiskipum.

§ 73. § 13, § 21, stk. 1, § 26, § 29, stk. 2, § 35, § 37, § 39, § 40, § 41, § 42, § 43 og § 48 er ikke gældende for fiskeskibe.

§ 74. Landsstyret kan fastsætte regler, der fraviger loven for skibe, der ikke er registreringspligtige, og for skibe til fiskeri eller andet særligt formål.

§ 75. Landsstyret fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 57 af 3. november 1967 om sømænd og lagtingslov nr. 5 af 28. februar 1956 om hviletid på færøske fiskeskibe.

Viðmerkingar

Uppskotið er gjørt av sama arbeiðsbólki, sum hevur gjørt uppskotini til manningarlóg og løgtingslóg um sjóvinnu (tingmál nr. 114 og 115/1986).

Uppskotið er gjørt við støði í donsku lógini frá 1985, sum gjørd varð eftir norðurlendskt fyrireikingarsamstarv.

Í sambandi við, at lógin um sjómenn verður sett í gildi, mælir arbeiðsbólkurin til, at niðanfyri standandi kunngerðir skjótast til ber verða settar í gildi við heimild í sjómannalógini:

Bekendtgørelse nr. 731 af 29. december 1982 om lægeundersøgelse af søfarende og om udkigstjeneste. Ændret ved bekendtgørelse nr. 642 af 15. december 1983.

Bekendtgørelse nr. 611 af 29. november 1973 om søfarendes ret til afsked og fri hjemrejse ved graviditet.

Bekendtgørelse nr. 613 af 29. november 1973 om skibsofficerers tjeneste og ansvarsområde om bord i skibe.

Bekendtgørelse nr. 553 af 21. november 1984 om sikkerhedsrepræsentanter i skibe.

Bekendtgørelse nr. 14 af 12. januar 1976 om forebyggelse af malaria blandt søfarende.

Bekendtgørelse nr. 54 af 7. februar 1983 om kostforplejningen i danske skibe.

Bekendtgørelse nr. 610 af 29. november 1973 om sundhedstjenesten i skibe.

Bekendtgørelse nr. 612 af 29. november 1973 om erstatning til søfarende for ejendele, der er gået tabt ved forlis eller andet havari. Ændret ved bekendtgørelse nr. 124 af 2. april 1980.

Bekendtgørelse nr. 614 af 29. november 1973 om ret til pleje og fri rejse m.v. efter sømandsloven.

Bekendtgørelse nr. 609 af 29. november 1973 om bistand til forsendelse af søfarendes hyremidler.

Bekendtgørelse nr. 351 af 10. juli 1978 om søfartsbøger og om mønstring af søfarende m.v.

Harumframt eru við heimild í hesari lóg settar í gildi:

Bekendtgørelse nr. 732 af 21. december 1982 om offentlig sygesikring for søfarende m.fl.

Bekendtgørelse nr. 406 af 16. august 1983 om dagpenge til søfarende ved sygdom eller fødsel.

Viðvíkjandi § 1

Nevnda lógargrein sigur, hvat skal skiljast við sjómenn.

Orðaskifti hevur verið í arbeiðsbólkinum, hvørja støðu fólkið, sum starvast á verksmiðjuni á verksmiðjutrolarum, hevur eftir lógaruppskotinum.

Semja er um, at hesin starvsbólkur, sum náttúrliga hoyrir heima á nýggjara fiskiskipaflota okkara, eigur at verða fevndur av § 1 og sostatt koma undir tær fullu verndarreglurnar, sum sjómannalógin setur.

Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at H. Andreasen frá »Direktoratet for søfarende« segði á fundinum, sum hann hevði við arbeiðsbólkin, at hann var í iva, um hesin parturin av manningini varð fevndur av § 1 í donsku lógini.

Viðvíkjandi § 2

Henda lógarregla viðvíkur teimum persónum, sum ikki beinleiðis kunnu roknast sum vanlig manning á skipum.

Fiskifrøðingar og onnur vísindafólk umborð á havrannsóknarskipum kunnu nevnast sum dømi um fólk, sum fevnd eru av § 2.

Sum sæst á lógarorðingini, so hava hesir starvsbólkar ikki somu vernd sum teir sjómenn, sum fevndir eru av § 1.

Viðvíkjandi § 3

Umboð fyri Fiskimannafelagið og aðrar limir í arbeiðsbólkinum hava víst á, at danska orðingin av § 3 er gjørd serstakliga fyri danska farmaskipaflotan, og er áskoðan teirra, at galdandi føroyska skipanin viðvíkjandi starvsetan á fiskiskipum framvegis skal verða galdandi.

Hetta er grundgevingin fyri serligu reglunum í greinini, sum gjørdar eru fyri fiskiskip, og sum bólkurin sum heild hevur tikið undir við.

Víst verður á, at skotið verður upp, at sjóvinnuráðið, sum nevnt verður til at seta á stovn, skal gera ummæli til tann hýruavtaluformála, sum Føroya Landsstýri skal gera fyri sjómonninar.

Viðvíkjandi § 4

Í uppskotinum til stk. 1 er tann broyting gjørd í mun til donsku lógina, at aldursmarkið í uppskotinum verður sett til 15 ár, tó solciðis at 16 ára aldursmark skal verða galdandi fyri brúgva- og maskintænastu.

Orsøkin til, at skotið verður upp at nýta 15 ára aldursmarkið er tann, at skúlaaldurin í Føroyum er 15 ár, og at vanligt hevur verið, at dreingir eru farnir til skips, tá ið teir eru komnir í henda aldur.

Sambært altjóða sáttmálanum innan sjóvinnuøki verður tó kravt, at aldursmarkið fyri brúgva- og maskintænastu verður sett til í minsta lagi 16 ár.

Viðvíkjand § 5

Henda lóggarregla ásetir uppsagnarfreistina fyri sjómenn, um so er, at ikki annað er avtalað.

Víst verður á, at uppsagnarfreistin fyri yvirmenningar er viðgjørd í § 37.

Víst verður eisini á § 6, stk. 5 sum viðvíkur fiskiskipum.

Viðvíkjandi § 6

Sum orðingin vísir, so er henda grein bert galdandi, um ikki annað er avtalað.

Viðvíkjandi 5. stk. er her talan um nýtt uppiskoyti, sum sett er í lógaruppskotið eftir uppskoti frá umboðum fyri Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið.

Viðvíkjandi § 7

Her hevur arbeiðsbólkurin trý *alternativ* uppskot, solciðis at eina uppskotið er, at sjómaðurin skal hava verið umborð ella í tænastu í 6 mánaðir, t.v.s. sama sum í donsku lógini.

Landsstýrið tók undir við hesum uppskoti.

Uppskot var eisini um at seta 3 ella 4 mánaðir inn í nevnda lógartekst.

Somja er um í arbeiðsbólkinum, at manningin á fiskiskipum, sum t.d. fara inn at bunkra, sambært seinasta punktum í nevndu lógargrein ikki kann krevja at sleppa av.

Viðvíkjandi § 8

Viðvíkjandi tíðini, sum sjómaður skal hava verið í starvi á sama skipi ella skipum, sum hoyra sama reiðara til, eru her trý alternativ uppskot.

Eina uppskotið er, at sjómaður skal hava verið 6 mánaðir hjá sama reiðara ella sama skipi, og skulu útreiðslurnar í sambandi við heimferðina í hesum føri býtast við 50% til Føroya Landsstýri og 50% til reiðaran.

Landsstýrið valdi hetta uppskotið.

Uppskot eru eisini um at hava 3 mánaðir ella 4 mánaðir, og skulu útreiðslurnar í hesum føri býtast við 25% til Føroya Landsstýri og 75% til reiðaran.

Grundgevingin fyri hesari reglur er, sum eisini verður nevnt í donsku við-

merkingunum, tann, at tað hevur almennan áhuga hjá føroyingum, at okkara sjómenn ikki missa tilknýti til Føroyar, og at vit eisini framyvir koma at hava neyðuga talið av vælútbúnum sjófólki.

Í hesum sambandi verður víst til tær serligu avtalurnar, sum gjørdar eru m.a. í Danmark um serligar ódýrar flogferðir hjá sjófólki, sum siglir í útlondunum.

Sambært § 70 hevur Føroya Landsstýri heimild til at seta § 8 í gildi eisini fyri sjófólk, sum ikki hava bústað í Føroyum.

Viðvíkjandi § 9

Her verður víst til uppskotið um kunngerð, sum mælt verður landsstýrinum til at seta í gildi við heimild í hesari lógargrein.

Viðvíkjandi § 10

Í fyrsta stk. í hesari grein er gjørd tann broyting í mun til donsku lógina, at arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at Føroya Landsstýri rindar útreiðslurnar til heimferðina, tá ið hjúnafelagi ella barn hjá sjómanni er deytt ella illa sjúkt.

Orðaskifti hevur verið í arbeiðsbólkinum um møguleikan fyri undantøkslu av hesari reglu, men var niðurstøðan tann, at útreiðslurnar hjá ti almenna av hesari lógarreglu ikki verða stórar, og tað er heilt náttúrligt, at tað almenna rindar í slíkum førum.

Eftir orðingini er stk. 1 ikki galdandi í ti føri, at sjómaður ógiftur býr saman við gentu, og hon doyr ella verður illa sjúk.

Orðaskifti hevur verið, um ikki rættast var eisini at fáa sambúgvandi undir hesa reglu, men eru trupulleikar her sum í øðrum lógum at áseta, nær persónur skal metast at vera sambúgvandi við øðrum persóni.

Viðvíkjandi § 11

Í 3. petti í nevndu lógargrein verður nevnt, at sjómaður, sum er illa viðfarin umborð, og merkir hetta ikki bert líkamliga illa viðfarin, men kann lógargreinin eisini í serligum førum nýtast, har t.d. sjómaður verður serliga grovt argaður.

Talan skal eftir orðingini verða um ringa viðferð umborð, og levnir lógargreinin tí ikki um føri, har sjómaður verður fyri harðskapi í landi, meðan skipið liggur inni.

Viðvíkjandi § 12

Eftir orðingini av hesari lógargrein, so kann sjómaður bert krevja at sleppa av, um hann aftaná, at hann varð hýraður, fær kunnleika um tær umstøður, viðmerktar verða.

Við øðrum orðum kann hann ikki krevja at sleppa av, um so er, at hann áðrenn hýringina hevði kunnleika um, hvagar skipið skuldi sigla, um ikki umstøðurnar í nevnda øki broytast frá tí, at maður hevur fingið hýru.

Sambært 2. stk. skal skiparin sláa upp ella á annan hátt kunngera ferðaætlanina og broytingar í hesari.

Viðvíkjandi § 13
Grundgevingin fyri hesari lógargrein má metast at vera tann, at sjómaðurin skal verða leysur av sáttmála sínum, um so er, at fyritreytirnar fyri hesum sáttmála verða munandi broyttar.

Sambært § 73 verður henda lógargrein ikki galdandi fyri fiskiskip.

Viðvíkjandi § 14

Viðvíkjandi § 15
Nær sjólíkagreiðing skal fara fram, er viðgjørt í sjólógini §§ 301 og 302.

Viðvíkjandi § 16
Her var talan um tvey alternativ uppskot, og samsvarar *alternativ A* við galdandi donsku lógargreinina.

Alternativ B er sett inn eftir uppskoti frá parti av arbeiðsbólkinum, og um so er, at hetta uppskot verður sett í lógina, so førir tað við sær, at § 38 og § 44 verða fluttar soleiðis, at t.d. tann í donsku lógini nevnda § 39 verður § 44 o.s.v., umframt at allar greinirnar, har vist verður til hesar greinir, eisini skulu broytast samsvarandi hesum.

Grundgevingin fyri alternativ B uppskotinum er tann, at rættast er, at allir starvsbólkar umborð, í tann mun hetta ber til, eiga at verða javnstillaðir og meta uppskotsstillararnir tí, at § 38 og 44, sum í donsku lógini eru settar bert at galda yvirmenn, skulu førast yvir í § 16, soleiðis at tær koma at verða galdandi fyri vanliga sjómannin eisini.

Landsstýrið tók alternativ B við í uppskotið.

Viðvíkjandi § 17
Henda greinin snýr seg um, undir hvørjum treytum sjómaður kann verða avkoyrdur, t.v.s. skal fara úr starvinum, uttan honum verður givið vanliga uppsagnarfreistin.

Viðvíkjandi pkt. 1 var arbeiðsbólkurin samdur um at nýta orðingina »ónýtiligur«, og liggur í hesum eitt krav um, at talan skal verða um veruligan grovan ódugnaskap.

Viðvíkjandi § 18
Her verður víst á, at um so er, at alternativ B í § 16 verður nýtt, so skal bert. § 17 verða nevnd í hesari greinini, av tí at § 17 so verður einasta avkoyringargreinin.

Greinin er eisini galdandi fyri fiskiskip, og tí er í fyrsta stk. sett inn ein regla, sum sigur, hvussu hýran fyri fiskiskip skal roknast.

Arbeiðsbólkurin hevur mett, at av tí at eingin onnur fastsett hýra er uttan minstaløn, so er rætlast at nýta hesa minstaløn sum grundarlag, soleiðis at vanliga manningin fær eina ferðina minstalønina fyri hvønn mánað, og restin av manningini so fær minstalønina faldað við tí partsbýti starvsbólkanna imillum, sum ásett er í sáttmálanum.

Viðvíkjandi § 19

Skipbrot í hesari lóg verður tulkað sum sjóskaði, t.vs. bæði at skipið fer fyri skeyti og minni skaði.

Eisini her er lógarreglan galdandi fyri fiskiskip, og verður hýruáognin roknað út samsvarandi reglunum í § 18.

Viðvíkjandi § 20

Viðvíkjandi § 22

Henda lógarregla er eisini galdandi fyri fiskiskip, og er útrokningarhátturin settur inn sum 4. stk. í nevndu lógargrein.

Hesin útrokningarháttur samsvarar við tann útrokningarhátt, sum galdandi er sambært sáttmálanum millum Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið.

Viðvíkjandi § 23

Viðvíkjandi § 24

Greinin er galdandi fyri fiskiskip og er tí sett inn sum 5. stk. reglur um, hvussu avrokningin skal fara fram fyri hesi skip.

Henda reglan er gjørd við grundarlagi í ásetingunum í sáttmálanum.

Viðvíkjandi § 25

Viðvíkjandi § 26

Viðvíkjandi § 27

Tá Føroyar ikki hava sjálvstøðuga uttanríkistænastu, er í 7. stk. sum í donsku lógini ásett, at danski konsulin skal taka sær av sjómanni uttanlands.

Viðvíkjandi § 29

Her verður talað um »í starvi«, og merkir hetta, at sjómaðurin er umborð á ávísum skipi.

Stk. 5 í hesari lógargrein er sett í lógaruppskotið eftir áheitan frá limi í arbeiðsbólkinum, og er grundgevingin fyri uppskotinum tann, at fiskimenn, tá talan er um skaða ella sjúku eftir galdandi skipan, ikki fáa endurgoldið veruliga inntøkumiss sín.

Umboðið fyri Reiðarafelagið í arbeiðsbólkinum hevur viðmerkt, at teir ikki meta, at henda regla skal setast í lógina, av tí at her er talan um viðurskifti, sum skuldu verið viðgjørd í sáttmálanum.

Viðvíkjandi § 30

Viðvíkjandi fiskiskipum verður vist til viðmerkingarnar undir § 29.

Í sambandi við hesa lógargrein kann viðmerkjast, at partar av arbeiðsbólkinum hava skotið upp, at settar verða inn í lógina reglur, sum áleggja reiðaranum at síggja til, at sjómaður er tryggjaður móti skaða og sjúku, bæði tá ið hann er umborð, og tá hann er heima.

Umboð fyri reiðarafeløgini hava viðmerkt, at teir eru samdir í, at náttúrligt er, at reiðararnir hava ábyrgd av, at sjómaðurin er tryggjaður umborð, men at sjófólkið saman við fakfeløgum sínum eigur sjálvt at skipa fyri tryggjing, meðan sjófólkið er á landi.

Viðvíkjandi § 31

Viðvíkjandi § 32

Henda reglan er galdandi fyri alla manningina, t.v.s. eisini skiparan og, um so er, at skiparin doyr, áliggja tær skyldur, sum nevndar eru í lógini, hægsta stýrimanni skipsins.

Viðvíkjandi § 33

Viðvíkjandi § 34

Fyri fastlønt sjófólk er § 35 galdandi.

Viðvíkjandi § 35

Í hesari grein er gjørd tann broyting í mun til donsku lógina, at arbeiðsbólkurin hevur gjørt hesa reglu fyri fastlønt sjófólk, meðan m.a. danskarar nýta ordingina reiðarísett fólk.

Fastlønt fólk merkir, at sjómaðurin fær fasta mánaðarløn og sostatt eisini fær løn, tá ið hann er í landi.

Hesir sjómenn eru eftir ordingini tryggjaðir sjúkrahýru v.m., sjálvt um teir ikki eru umborð, tá ið teir gerast sjúkir ella doyggja.

Fyri aðrar enn fastløntar sjómenn er sambært § 29 tann regla galdandi, at teir bert hava rætt til sjúkrahýru, um so er, at teir gerast sjúkir umborð.

Uppskot hevur verið frammi í bólkinum um at gera reglurnar í § 35 galdandi fyri alla manningina, men tyktist meirituti ikki at vera fyri hesum uppskoti.

Viðvíkjandi § 36
§ 36 til 45 áseta serreglur fyri skipsyvirmenn.
Hvat skipsyvirmaður merkir, er ásett í § 36, 2. stk.

Viðvíkjandi § 37
Uppsagnarreglurnar í hesari grein eru sambært § 6, 5. stk. og § 73 ikki galdandi fyri fiskiskip.
Í sambandi við reglurnar um uppsagnarfreistir hevur uppskot verið frammi í arbeiðsbólkinum um alment galdandi fyri allar starvsbólkar umborð at seta í sjómannalógina reglur, sum samsvara við uppsagnarreglurnar, sum galdandi eru fyri starvsmenn.
Meiriluti tyktist tó ikki at vera fyri hesum uppskoti, og onkur limur í arbeiðsbólkinum hevur víst á, at stórur munur er á starvsviðurskiftunum umborð á skipum og teimum starvsviðurskiftum, sum starvsmenn hava.
Sum nýtt 3. stk. er sett inn regla, sum ger, at uppsagnarfreistirnar ikki eru galdandi, tá lógliga frábodaður arbeiðsstaður er.
Henda regla er sett inn fyri at forða fyri, at sjómaður orsakað av ásettu uppsagnarfreistunum ikki sleppur at taka lut í lógligum verkfalli.

Viðvíkjandi § 38
Sambært § 39 so er tann munur millum vanliga sjómannin og skipsyvirmann, at sjómaðurin sambært § 7 skal biðja um avloysing ella siga seg úr starvi við 4 vikurs freist, meðan skipsyvirmaðurin, um ikki annað er avtalað, skal boða frá við 3 mánaða freist.

Viðvíkjandi § 39
Reglan er gjørd fyri at tryggja skipsyvirmanninum, tá hann gerst óarbeiðsførur.
Sambært § 73 er henda grein ikki galdandi fyri fiskiskip, av tí at arbeiðsbólkurin hevur mett, at manningin á fiskiskipum framvegis skal verða tryggjað við teimum lógum, sum galdandi eru fyri almannaveitingar, og reglunum um Lønjavningargrunnin.

Viðvíkjandi § 41
Reglan er bert galdandi, tá skipsyvirmaðurin verður uppsagdur, og ikki tá hann sjálvur sigur upp.
Upphæddirnar, sum nevndar eru í hesari grein, skulu rindast, tá skipsyvirmaðurin fer av, t.v.s. at hesin vanliga í slíkum førum fyrst fær uppsagnarhýruna frá tí degi, hann verður uppsagdur, og til hann fer úr starvi, og hurumframt

sambært § 42 fær uppheddirnar, sum svara avikavist til 1, 2 ella 3 mánaða hýru.

Greinin er sambært § 75 ikki galdandi fyri fiskiskip.

Henda grein er ein vernd máti, at skipsyvirmonnum verða uppsagdir uttan saklíga grund ella við órætti verða avkoyrdir.

Viðvíkjandi § 43

Henda regla viðvíkur rættindum skipsyvirmans, tá hann verður avkoyrdur.

Høvuðsreglan er, at yvirmaðurin hevur rætt til 3 mánaða hýru, um ikki vanligar endurgjaldsreglur heimila størri endurgjaldi.

Viðvíkjandi § 44

§§ 44 til 48 áseta tær reglur, sum galdandi eru fyri skiparan.

Sambært § 44 so er hjá skiparanum ikki kravt, at gerast skal veruligur hýru avtaluformáli, men sagt verður bert, at skrivlig avtala skal gerast.

Viðvíkjandi § 45

1. stk. í hesari reglu er grundað á, at staða skiparans umborð ger at neyðugt er, at reiðarin hevur serligt álit á skiparanum, og um hetta álit ikki er til staðar, so er neyðugt, at reiðarin beinanvegin kann siga skiparan úr starvi.

Skiparin fær tó sambært ordingini í 3. stk. í høvuðsheitum ta somu fíggjarligu vernd, sum skipsyvirmonnini hava.

Viðvíkjandi § 47

Henda regla vísir á, hvørjar greinir frammanfyri í lógini eru galdandi eisini fyri skiparan.

Viðmerkjast skal, at arbeiðsbólkurin eftir uppskoti frá einum av fundarluttakarunum hevur tikið við í § 49 aðrar greinir enn tær, sum galdandi eru í donsku lógini.

Hetta er gjørt fyri at veita skiparanum part av tí vernd, sum galdandi er fyri sjómannin.

Viðvíkjandi § 48

Viðvíkjandi § 49

Viðvíkjandi § 56

Í sambandi við hesa lógargrein hevur verið orðaskifti, um sjómaðurin hevur rætt at taka við umborð øl og spiritus.

Sambært viðmerkingum í grannalondum okkara, so er tað skiparin, sum metir, um rætt er at lata manningina taka slíkar drykkjuvørur umborð á skipið.

Viðvíkjandi § 59
Í sambandi við hesa grein verður mælt landsstýrinum til at seta í gildi kunngerð, har nærri verður fyrisett, hvussu endurgjaldið skal ríndast.

Viðvíkjandi § 60
Henda reglan gevur skiparanum tær heimildir umborð á skipum, sum løgreglan hevur á landi.

Reglan er tengd saman við § 51, sum sigur, at skiparin hevur hægsta myndugleika umborð, og § 53, sum sigur, at sjómaður skal verða boðum, hann fær í starvinum, lýðin.

Viðvíkjandi § 61
Í hesum føri fær skiparin eisini tann myndugleika umborð, sum løgreglan hevur í landi.

Reglan er tó ikki galdandi, um skipið er í føroyskari havn.

Viðvíkjandi § 62
Sambært 1. stk. so kann sjómaður leggja uppgerð skiparans fyri fyrisitingina fyri sjómenn.

Vísandi til tað, sum nevnt er í innganginum til hetta álit, merkir arbeiðsbólkurin til, at landsstýrið skjótast til ber setir á stovn sjóvinnufyrisiting.

Í Danmark hava teir sum kunnugt Direktoratet for søfarende, sum hevur tær heimildir, sum ætlanin er at leggja til føroysku sjóvinnufyrisitingina.

Viðvíkjandi § 63
Greinirnar 63 til 71 áseta revsifyriskipanir fyri ymisk brot á reglurnar í hesari lóg.

Viðvíkjandi § 66
Orðið skipbrot merkir, at skipið fer fyri skeyti, ella annar sjóskaði hendir.

3. stk. vísir til reglurnar í § 371 í sjólógini, sum viðvíkja teimum skyldum, sum skiparin hevur umborð.

Viðvíkjandi § 70
Orðaskifti hevur verið í arbeiðsbólkinum, um føroyskir sjómenn, sum hava bústað í Danmark, beinleiðis skulu hava rættindi, sum ásett eru í hesari lógargrein.

Semja tykist tó vera um, at bert teir, sum hava bústað í Føroyum, skulu beinleiðis verða fevndir av ásetingunum, og kann landsstýrið so sambært omanfyri nevndu lógargrein við kunngerð áseta reglur um sjómenn, sum ikki hava bústað í Føroyum.

Viðvíkjandi § 71
Her verður mælt til, at landsstýrið setir kunngerð í gildi, sum nærri ásetir fyri skipanirnar samsvarandi hesari lógargrein.

Viðvíkjandi § 73
Henda lógargrein ásetir, hvør partur av lógini ikki er galdandi fyri fiskiskip.

Sum viðmerkt í innganginum, so hevur arbeiðsbólkurin miðað ímóti í størst møguligan mun at gera lógina galdandi beinleiðis fyri fiskiskip, men nakrar av reglunum kunnu náttúrliga ikki beinleiðis nýtast fyri henda part av flota okkara.

Umboð fyri Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið hava mett um, hvørjar av lógunum ikki eru hóskandi fyri fiskiskipini.

Viðvíkjandi § 74
Her er talan um nýggja lógargrein, sum sett er inn í lógina eftir uppskoti frá einum limi í arbeiðsbólkinum.

Meginparturin av hesari lógargrein er tikin úr § 9 í starvsmannalógini, og hevur uppskotsstillarin mett, at tey rættindi, sum starvsmenn hava, ið hvussu so er í ávísan mun eisini skulu koma í sjómannalógina.

Viðvíkjandi § 75
Mælt verður landsstýrinum til at gera kunngerð, sum nærri ásetir reglur viðvíkjandi hesum bólki av skipum, hóast arbeiðsbólkurin ikki metir, at hesi eru nógv í tali.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið hin 7. apríl 1987. Uppskotið er í síni heild partur av sama lóggávuverki, sum løgtingsmálini nr. 114 og 115, ið skulu laga føroyskar reglur til galdandi millumtjóða reglur á hesum øki. Vantandi nýggj lóggáva á hesum øki hevur longu gjørt føroyingar til eftirbátar viðvíkjandi rættindum í millumtjóða sigling.

Málið var til 1. viðgerð hin 8. apríl 1987 og varð beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Nevndin heldur málið vera so umfatandi, at hon eigur at fáa stundir at viðgera tað meira gjølla, enn møguligt er við so stuttum skotbrá beint fyri tingslit.

Rættarnevndin mælir til, at uppskot til sjómannaløgtingslóg verður viðgjørt

framhaldandi í nøttarnevndini, sum leggur fram álit í málinum viðvíkjandi ólavsøkutingsetuni. Hesum samsvarandi setir nevndin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur nøttarnevndini at viðgera uppskot landsstýrisins um sjómannaløgtingslóg sum millumtingagnevnd og at leggja málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 10. apríl 1987. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1600-3-3

130 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1987, mikudagin 8. apríl legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður § 2 strikað.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi frá 1. januar 1988.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af landsskat med senere ændringer udgår § 2.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins inniber, at verandi barnafrádráttur sambært § 2 í útroknaða landsskattinum eftir § 1 nr. 1-6 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinni broytingum verður avtikin. Hetta er tongt at teimum umstøðum, at reglurnar um barnafrádrátt verða broyttar við øðrum uppskoti til løgtingslóg frá landsstýrinum.

1. viðgerð 9. apríl. Málið verð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av Føroya Landsstýri hin 8. apríl 1987 og aftaan á 1. viðgerð hin 9. apríl 1987 beint í løgtingsins almanna- og heilsunevnd. Málið er viðgjørt saman við tingmáli nr. 134/1986: løgtingslóg um barnastyrk og snýr seg um at taka burtur verandi barnafrádrátt í útroknaða landsskattinum.

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, sum tekur undir við uppskotinum frá landsstýrinum.

2. viðgerð 13. apríl. § 1 varð samtykt við 25-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Við 21-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

Lóg nr. 27 frá 30. apríl 1987

131 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjøld av motorakførum

Ár 1987, týsdagin 7. apríl legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í logtingslóg um skráseting av motorakforum v.m.

lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjøld á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 7a verður sett:

»Dragivognar (traktorar) til leguvognar:

virðisgjald:	13%
vektgjald:	einki gjald«

2) § 7 verður § 7b.

3) § 11 verður broytt soleiðis:

»§ *11a.* Campingvognar:

virðisgjald:	40%
vektgjald:	10 kr. pr. kg

§ *11b.* Viðfestivognar við sløkkiútgerð:

virðisgjald:	einki gjald
vektgjald:	einki gjald

§ *11c.* Aðrir viðfestivognar:

virðisgjald:	einki gjald
vektgjald:	4 kr. pr. kg.«

§ 2.

Eftir umsókn er landsstýrinum heimilað at broyta skrásetingargjaldið fyri motorakfør v.m., ið eru skrásett eftir løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift af køretøjer foretages følgende ændringer:

1) Som ny § 7a indsættes:

»Motorforvogne (traktorer) til sættevogne:

værdiafgift:	13%
vægtafgift:	ingen afgift«

2) § 7 ændres til § 7b.

3) § 11 ændres således:

»§ *11a.* Campingvogne:

værdiafgift:	40%
vægtafgift:	10 kr. pr. kg

§ *11b.* Påhængsvogne med brandslukningsmateriel:

værdiafgift:	ingen afgift
vægtafgift:	ingen afgift

§ *11c.* Andre påhængsvogne:

værdiafgift:	ingen afgift
vægtafgift:	4 kr. pr. kg.«

§ 2.

Efter ansøgning hjemles landsstyret til at ændre den erlagte registreringsafgift for motorkøretøjer m.v., der er registreret i henhold til lagtingslov

um skrásetingargjald á motorakførum v.m. í samsvari við § 1.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift m.v. efter reglerne i § 1.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 og samstundis við broyting í tolllógini varð avgjaldið av motorakforum v.m. broytt frá bert at vera eitt innflutningsgjald til eina samanseting av innflutningsgjaldi og einum skrásetingargjaldi.

Royndirnar, síðani lógin um skrásetingargjald kom at virka fyrst í oktober 1986, hava vist, at ymsar ábøtur eiga at verða gjørdar, tí reglurnar hava virkað óhóskiligar.

Til einstøku stykkini í uppskotinum verða gjørdar hesar viðmerkingar:

1) Dragivognar kunnu bert nýtast til flutning av vørum saman við einum leguvogni. Tí er skotið upp, at eingi vektgjald verður latið, tí tað er totalvekt á leguvogninum, ið er avgerandi fyri gjaldið. Harumframt er at siga, at ein dragivogn ikki er ein lastvognur, men bert verður nýttur til flutning saman við einum leguvogni.

2) Broyting av §-nummari.

3) Royndirnar hava vist, at gjaldið á smærri viðlestivognum av tí slagnum, sum verða nýttir aftan á vanligum persónbili ella vøruvogni av handverkarum o.o. til smáflutningar (verktoy, smærri nøgdir av tilfari, fóður o.s.fr.), er sett so høgt, at útsøluprísurin er farin upp ímóti tí dupulta.

Herumframt er gjørt vart við, at tað eru kommunal sløkkilið, sum í staðin fyri at keypa sløkkibil útvega sær viðfestivogn við sløkkiútgerð, sum so kann flytast við einum tøkum motorakfari. Slíkir viðfestivognar verða útgjørdir í samráð við brunaeftirlitið og verða góðkendir av bileftirlitinum.

Núverandi § 11 er sostatt býtt upp í:

11a: Campingvognar,

11b: Viðfestivognar við sløkkiútgerð,

11c: Aðrir viðfestivognar.

1. viðgerð 9. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 7. apríl 1987 og undir fyrstu viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Hilmar Kass, Heini O. Heinesen og Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum og setir tí einki broytingaruppskot fram.

Minnilutin (Agnar Nielsen) førir fram:

Tá ið løgtingsmál nr. 131/1986: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald var til viðgerðar, fall møguleikin burtur at innflyta brúktar bilar sera teir í stand og selja teir. Hesin innflutningur gav fleiri verkstøðum nógv arbeiði og hópur av væl ístandsettum dygdargóðum bilum var úrslitið.

Minnilutin metir, at landsstýrið eins og í fyriliggjandi máli átti at kannað møguleikan fyri, at verkstøð aftur fingu loyvi ella rættari brúkbaran møguleika fyri at innflutt brúktar bilar, sum t.d. ikki vóru eldri enn eitt ávist áramál og í rímiligum standi til at vera afturgjørdir, og við hesum setir hann soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at útvega verkstaðum ein brúkbaran møguleika fyri innflutningi av brúktum bilum.

2. viðgerð 13. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 26-0 atkvøðum, §§ 2 og 3 samtyktar við 27-0. Við 27-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 407-2-8. Lóg nr. 22 frá 30. apríl 1987

132 Løgtingslóg um eykaviðbót til ávísar avlamispensiónistar

Ár 1987, týsdagin 7. apríl legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um eykaviðbót til ávísar avlamispensiónistar.

§ 1.

Henda lóg fevnir um fólk, sum hava rætt til avlamispensión eftir avlamispensiónslógini, tað er »Bekendtgørelse af lov for Færøerne om invalidepension m.v.« nr. 409 frá 26. august 1983 við seinni broytingum.

§ 2.

Eykaviðbót eftir hesi løgtingslóg er munurin ímillum avlamispensión útroknað eftir avlamispensiónslógini og taupphæddina, sum vildi verið goldin, um orðini »eller den med ham samlevende ægtefælle« í avlamispensiónslógini § 6, punkt 1) a og § 7, 1. stk. ikki vóru galdandi fyri grundupphædd.

§ 3.

Útreiðslurnar til eykaviðbót vera rindaðar eftir løgtingslóg um býti av sosialu útreiðslunum sum Føroya partur av útreiðslunum eftir avlamispensiónslógini.

2. stk. Reglurnar í avlamispensiónslógini hava annars samsvarandi gildi fyri eykaviðbót eftir hesi løgtingslóg.

løgtingslov om særtillæg til visse invalidepensionister.

§ 1.

Denne lov omfatter personer, der har ret til invalidepension i henhold til invalidepensionsloven, det vil sige bekendtgørelse af lov for Færøerne om invalidepension m.v. nr. 409 af 26. august 1983 med senere ændringer.

§ 2.

Særtillæg efter denne lagtingslov udgør forskellen mellem invalidepension udregnet efter invalidepensionsloven og det beløb, der ville komme til udbetaling, såfremt ordene »eller den med ham samlevende ægtefælle« i invalidepensionsloven § 6, punkt 1 a og § 7, stk. 1 ikke var gældende, hvad angår grundbeløb.

§ 3.

Udgifterne til særtillæg afholdes i medfør af lagtingslov om fordeling af sociale udgifter som Færøernes andel af udgifterne efter invalidepensionsloven.

Stk. 2. Reglerne i invalidepensionsloven finder iøvrigt tilsvarende anvendelse på særtillæg efter denne lagtingslov.

§ 4.

Henda lóg fær gildi 1. oktober 1987.

§ 4.

Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1987.

Viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at broyta figgjarviðurskiftini hjá giftum avlamispensiónistum, tá hjúnafelagin hevur inntøku.

Sum er verður grundaruppbæddd og pensiónsviðbót javnað eftir inntøku, og verður tá roknað við inntøku hjá bæði avlamispensiónistinum og hjúnafelaganum. Grundaruppbæddin verður skerd, um árliga arbeiðsinntøkan hjá báðum tilsamans er hægri enn 54.700 kr. Avlamisviðbót og møgulig óarbeiðsførisviðbót verða ikki skerdar vegna inntøku.

Uppskotið ber í sær, at grundaruppbæddin verður ikki skerd vegna inntøku hjá hjúnafelaga. Annars verða reglurnar ikki broyttar.

Uppskotið broytir ikki figgjarviðurskiftini hjá avlamispensiónistum, sum eru støk, ella hvørja hjúnafelagi onga inntøku hevur.

Semja er við ríkisstýrinum um at fremja hesa broyting. Landsstýrið roknar við, at semja verður við ríkisstýrið um, at broytingin fer at fáa gildi 1. oktober 1987, hóast viðgerðin í fólkatinginum ikki kann vera liðug tá. Neyðugt verður tí at fáa heimild at gjalda tá.

Árligu meirútreiðslurnar av uppskotinum kunnu metast til 6,8 mió. kr. Um ríkisstýrið gongur við til, at broytingin fyri ríkiskassan fer gildi frá 1. oktober 1987, verður árliga meirútreiðsla landskassans um 1,5 mió. kr. fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober til 31. desember 1987.

Landsstýrið fyrireikar eisini aðrar munandi hækkingar í grunduppbæddini fyri fólka- og avlamispensiónistar samuleiðis at galda frá 1. oktober 1987.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram hin 7. apríl 1987 og aftan á 1. viðgerð hin 8. apríl 1987 beint í almanna- og heilsunevndina.

Endamálið við uppskotinum er at bera so í bandi, at ein avlamispensión verður óheft av inntøkuni hjá møguligum hjúnafelaga.

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, sum tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 10. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 28-0 atkvøðum, §§ 2-4 samtyktar við 28-0 atkvøðum. Við 28-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 13. apríl. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-15-3. Lóg nr. 51 frá 5. mai 1987

133 Broyting í donsku stuðulsskipanini til heimastýrið

Ár 1987, týsdagin 7. apríl legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu avtalu frá 9. mars 1987 millum ríkisstýrið og landsstýrið um stuðulsskipanina.

Viðmerkingar:

Undir samgongusamráðingunum var somja um, at tingingin skuldi takast upp við donsku stjórnina um broytingar í gildandi stuðulsskipan.

Longu í 60-unum varð byrjað at tala um eina broyting í skipanini av statsstuðlinum. Fyrst í 70-unum hendi í Danmark tað, at statsstuðulin til mat og kommunur varð umlagdur, og varð tá av álvara farið at tala um broyting eisini Føroyum og Grønlandi viðvíkjandi.

Tá Grønland fekk heimastýri í 1979, varð samstundis framd nýggj tilskotsskipan, har partur av statstilskotinum kom í »blokk«. Áður hevði forsætisráðharrin, Anker Jørgensen, sett niður nevnd at umhugsa eina føroyska/danska skipan.

Hetta samráðingarumfarið millum landsstýrið og stjórnina byrjaði 18. mars 1986 og endaði við avtalu dagf. 9. mars 1987. Tað hava verið fleiri fundir í tíðarskeiðinum, bæði til samráðingar við politiskari luttøku og til upplýsingar ímillum embætismenn.

Avtalan fevnir í høvuðsheitum um refusiónsøkið, har staturin og heimastýrið higartil hava goldið hvør sín part. Nakrar av uppgávunum eru slíkar, sum staturin higartil formliga hevur goldið 100%, t.d. andveikravernd, vinnuskúlar og viðgerð á Ríkishospitalinum.

Aðrar uppgávur eru ikki við í avtaluni og halda fram sum higartil. T.d. løgregla, sjóverja og kirkja.

Í »Betænkning for ændring af tilskudssystemet for Færøerne, 1979« verða nevndir 73 formar av ríkisútreiðslum í Føroyum. Talan er bæði um ymsar formar av refusión til heimastýrið og um útreiðslur, sum staturin hevur hildið einsamallur.

Talið av gjaldsskipanum minkar munandi eftir avtaluni:

- Ein blokkur verður til heimastýrið við avtalaðari reguleringsskipan. Í statsroknskapinum verður blokkurin tó førdur á tey einstøku ministaraøkini eftir tí, sum er avtalað fyri tey einstøku økini.
- Refusiónir verða til sosialar veitingar og sosialar stovnar. Her verða brúktir tveir %-satsir, 25 og 50. Í verandi skipan eru væl fleiri satsir. Meginreglan er, at refusiónin er óbroytt ella lækkað til annan av nevndu satsum, meðan restin av refusiónini er løgd í blokkin. Veitingar, sum refusión verður latin til, skulu verða góðkendar av statinum. Løgtingið kann tó játta veitingar, sum staturin ikki skal luttaka í.
- Ríkisútreiðslur, sum ikki eru við í avtaluni.

Støddin á blokkinum, smb. skjal E, byggir á tað budgetteraða virksemið í 1986, virðismett í 1985-prísum, síðan regulerað upp til 1987-prísir (+7,5) við tí avtalaða reguleringsmátanum og haraftrat avtalaðar meirveitingar, 33,9 mió. kr.

Refusiónsupphæddirnar á sosialu økinum eru budgetttøl fyri 1986 og eru ikki endaligt, men verða størri ella minni samsvarað teimum objektivu kriteriunum, t.v.s. eftir tí endaligu talinum av móttakarum til ymiskar veitingar ella roknskapartøl. Avtalaðar meirveitingar kunnu tó ikki fara upp um 8,5 mió. kr. í 1987-prísligu.

Tað er partur í avtaluni, at føroyska sjúkrahúsverkið í framtíðini skal gjalda fyri viðgerðartænastur á Ríkishospitalinum. Peningur er settur av til hetta í blokkinum, og avtala skal gerast við Ríkishospitalið um hetta virksemið.

Eftir hesi avtalu skal semja fáast við teir einstøku ministararnar um ta enda-

ligu umleggingina, hvar talan verður um fyrisitingarligar tillagingar og um møguligar lógartillagingar á fólkatingi og á løgtingi.

Viðvíkjandi tænastumannapensjónum, sum eru innan fyri avtaluøkið, er semjan ikki endalig, men verður samráðst víðari at greiða hesi viðurskifti.

Sí skjal 19

1. viðgerð 9. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 7. apríl 1987 og undir 1. viðgerð tann 9. í sama mánað beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgin Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) førir fram:

Í sjeytiárunum risti føroyski Javnaðarflokkurin fyri J.O. Krag og Anker Jørgensen, forsætismálaráðharrum, spurningin um at broyta verandi studningsskipan til eina blokkstudningsskipan líkari teirri, tær donsku kommunurnar høvdu.

Síðan tá hevur verið munandi torførari hjá føroyingum at samráðast við danskar ráðharrastovur um ábøtur innan umsitingarøki, sum eru felagsmál.

Í 1979 kom Betænkning om ændring af tilskudssystemet for Færøerne.

Tásitandi landsstýri gjørdi einki víðari í málinum restina av valskeiðinum.

Eftir valið í 1980 valdi Javnaðarflokkurin at standa uttan fyri samgonguna.

Nýggja landsstýrið við Sambandsflokkinum á odda gjørdi á fundi, fyrst við Anker Jørgensen, forsætismálaráðharra, og síðan Poul Schlüter, forsætismálaráðharra, greitt, at landsstýrið ynskti ikki eina blokkstudningsskipan sum hana, ið skotin var upp. Og hesa støðu góðtóku teir sjálvandi eisini.

Samstundis varð gjørt vart við, at Sambandsflokkurin var positivt sinnaður fyri at samráðast um eina skipan, sum førdi við sær, at verandi studningsskipan varð gjørd meira einføld og rationell.

Sambært einum áliti gjørt av eini nevnd við m.a. Skak-Nielsen og ríkisumboðsmannin framgongur, at núverandi samgonga setti fram ynski um at fáa eina blokkstuðulsskipan. Hetta framgongur eisini av samgonguskjalinum, sum landsstýrisflokkarnir gjørdu sínamillum í 1985.

Nevnda álit hevur ligið til grund fyri teirri avtalu, sum landsstýrið ynskti, og sum nú er undirskrivað. Føroya Landsstýri sjálvt kom ongantíð við nøkrum uppleggi.

Sambandsflokkurin heldur, at tann stuðulsskipanin, ið nú er skotin upp at galda fyri víkisveitingarnar til Føroya fer at stilla okkum nógv verri enn áður, og at hon fer at forða ti tætta og góða samarbeiði, sum higartil hevur verið landanna millum.

Núgaldandi endurgjaldsskipanin bar m.a. við sær, at høvi ofta beyðst føroyskum politikarum og embætis- og starvsfólkum at koma á tal við danskar myndugleikar, og tað hevur havt ómetaliga stóran týdning, at føroyingar hava kunnað umrøtt felags áhugamál við starvsfelagar og á tann hátt fingið nýggj hugskot og nýggjan íblástur.

Við nýggju skipanini fellur hetta høvi stórt sæð burtur og avmarkar samskiftið til mest at vera ein peninggaflutningur frá Danmark til Føroya.

Avtalan, sum hon fyriliggur í hesum málinum, snýr seg einans um krónur og oyru og leggur upp til eitt andaliga fátækt samstarv millum londini og javnsetur Føroyar við eina og hvørja danska amtskommunu.

Sambandsflokkurin ynskir, at samstarvið við Danmark skal vera ein samvinna millum tvær frælsar og frílyntar tjóðir í virðing hvør fyri aðrari.

Út frá hesum kann minnilutin ikki taka undir við landsstýrisuppskotinum og setir einki uppskot fram.

Hin minnilutin (Anfinn Kalsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Ásannandi at nýggja avtalan millum landsstýrið og donsku stjórnina um refusión av felagsútreiðslum er tað longsta, ið komast kann til í núverandi politisku støðu, tekur minnilutin undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein føst upphædd í staðin fyri lutfalsliga refusión økir ábyrgdina hjá løgtinginum og føroysku myndugleikunum og kann tí bert vera eitt stig á leiðini fram móti størri sjálvbjargni.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið varð samtykt við 22-0 atkvøðum fyri, 6 vóru ímóti.

F.L. j.nr. 450 1

134 Løgtingslóg um barnastyrk

Ár 1987, mikudagin 8. apríl legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um barnastyrk.

§ *1.* Barnastyrkur verður goldin fyri børn 15 ár og yngri.

§ *2.* Barnastyrkurin er um fjórðingsárið:
1) 2.200 kr. fyri børn, sum hava fylt ½ ár, men ikki 3 ár,
2) 1.400 kr. fyri børn, sum hava fylt 3 ár, men ikki 7 ár,
3) 1.200 kr. fyri børn, sum hava fylt 7 ár, men ikki 16 ár.

2. stk. Barnastyrkurin verður javnaður eftir føroyska prístalinum fyri fjórðingsárið frammanundan. Upphæddirnar í 1. stk. samsvara prístalinum 1. apríl 1987.

§ *3.* Fullur barnastyrkur verður goldin, um inntøkugrundarlagið er:
1) hjá støkum 160.000 kr. ella minni og
2) hjá hjúnum 340.000 kr. ella minni.

Um inntøkugrundarlagið er hægri enn ávikavist 160.000 kr. og 340.000 kr., verður barnastyrkurin lækkaður við 1% fyri hvørt byrjað tal av 1.000 kr., sum inntøkugrundarlagið er hægri enn 160.000 kr. ávikavist 340.000 kr.

2. stk. Inntøkugrundarlagið er skattskylduga inntøkan hjá mammuni, um barnið býr hjá henni, og annars skattskylduga inntøkan hjá tí, sum sam-

lagtingslov om børnetilskud.

§ *1.* Børnetilskud udbetales for børn på 15 år og derunder.

§ *2.* Børnetilskuddet udgør for hvert kvartal:
1) 2.200 kr. for børn, der er fyldt ½ år, men ikke 3 år,
2) 1.400 kr. for børn, der er fyldt 3 år, men ikke 7 år,
3) 1.200 kr. for børn, der er fyldt 7 år, men ikke 16 år.

Stk. 2. Børnetilskuddet reguleres ifølge det færøske prístal for det foregående kvartal. Beløbene i stk. 1 svarer til pristallet 1. april 1987.

§ *3.* Fuldt børnetilskud udbetales, såfremt indtægtsgrundlaget er:
1) for enlige 160.000 kr. eller mindre og
2) for ægtepar 340.000 kr. eller mindre.

Såfremt indtægtsgrundlaget overstiger henholdsvis 160.000 kr. og 340.000 kr., nedsættes børnetilskuddet med 1% for hver påbegyndte 1.000 kr., som indtægtsgrundlaget overstiger henholdsvis 160.000 kr. og 340.000 kr.

Stk. 2. Indtægtsgrundlaget er moderens skattepligtige indtægt, hvis bar-

bært § 6 fær goldið barnastyrkin. Í báðum førum verður skattskyldugu inntøkan samanløgd við skattskyldugu inntøkuni hjá hjúnafelaganum hjá tí, sum fær barnastyrkin goldnan.

3. stk. Inntøkugrundarlagið er skattskyldugu inntøkan í tí inntøkuári, sum var fult álmanakkaár áðrenn útgjaldingina. Inntøkugrundarlagið kann ikki verða broytt í einum álmanakkaári.

§ 4. Tað er ein treyt fyri útgjalding av barnastyrki, at barnið hevur heimstað í Føroyum og er tilmeldað fólkayvirlitinum.

§ 5. Barnastyrkur verður ikki útgoldin, um barnið er á barnaheimi ella í fosturheimi, sum tað almenna rindar fyri, ella um tað almenna annars forsyrgir barninum.

§ 6. Barnastyrkur verður goldin mammuni at barninum, um barnið býr hjá honni. Um barnið ikki býr hjá mammuni, verður barnastyrkurin goldin tí, sum hevur barnið í pleygu. Í serligum førum kann almannastovan taka avgerð um, at barnastyrkurin verður goldin á annan hátt.

§ 7. Barnastyrkur verður uttan umsókn goldin frammanundan fyri fjórðingsárið, fyrstu ferð fyri fjórðingsárið aftan á tað fjórðingsárið, har treytirnar eru loknar, og seinastu ferð fyri tað fjórðingsárið, har rætturin heldur uppat.

net bor hos hende, og ellers dens skattepligtige indtægt, som i henhold til § 6 får udbetalt børnetilskuddet. I begge tilfælde sammenlægges den skattepligtige indtægt med den skattepligtige indtægt hos ægtefællen til den, som får børnetilskuddet udbetalt.

Stk. 3. Indtægtsgrundlaget er den skattepligtige indtægt i det indtægtsår, som var et fuldt kalenderår inden udbetalingen. Indtægtsgrundlaget kan ikke ændres i et kalenderår.

§ 4. Det er en betingelse for udbetaling af børnetilskud, at barnet har hjemsted på Færøerne og er tilmeldt folkeregisteret.

§ 5. Børnetilskud udbetales ikke, hvis barnet er på børnehjem eller i plejehjem, som det offentlige betaler for, eller hvis det offentlige iøvrigt forsørger barnet.

§ 6. Børnetilskud udbetales til barnets mor, hvis barnet bor hos hende. Hvis barnet ikke bor hos moderen, udbetales børnetilskuddet til den, som har barnet i pleje. I særlige tilfælde kan almannastovan bestemme, at børnetilskuddet skal udbetales på anden måde.

§ 7. Børnetilskud udbetales uden ansøgning kvartalsvis forud, første gang for kvartalet efter det kvartal, hvori betingelserne er opfyldt, og sidste gang for det kvartal, hvori retten ophører.

§ *8.* Føroya Gjaldstova rindar barnastyrk.

2. stk. Almannastovan hevur annars fyrisitingina av barnastyrki um hendi.

3. stk. Avgerðir almannastovunnar kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

4. stk. Til nýtslu fyri fyrisitingina av hesi løgtingslóg lata Líkningarráðið, Landsfólkayvirlitið, Skattainnkrevjingarvaldið og aðrir myndugleikar Almannastovuni allar neyðugar upplýsingar í tørvandi skapi til nýtslu á tørvandi hátt.

5. stk. Landsstýrið kann áseta, at uppgávur almannastovunnar sambært hesi løgtingslóg í nærri áseittum vavi verða útintar av øðrum myndugleikum. Landsstýrið kann samstundis áseta, at avgerðir hjá hesum myndugleikum kunnu skjótast inn fyri Almannastovuna. Ásetanin í 3. stk. hevur eisini tá gildi fyri avgerðir almannastovunnar, og reglan í 4. stk. hevur tá samsvarandi gildi fyri upplýsingar til avvarðandi myndugleika.

§ 8. Føroya Gjaldstova udbetaler børnetilskud.

Stk. 2. Almannastovan varetager iovrigt administrationen af børnetilskud.

Stk. 3. Almannastovens afgørelser kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

Stk. 4. Til brug for administrationen af denne lagtingslov meddeler Ligningsrådet, Landsfolkeregisteret, Skatteindkrævningsmyndighederne og andre myndigheder Almannastovan alle fornødne oplysninger i fornøden form til brug på fornøden måde.

Stk. 5. Landsstyret kan fastsætte, at almannastovans opgaver i henhold til denne lagtingslov i nærmere bestemt omfang varetages af andre myndigheder. Landsstyret kan samtidig fastsætte, at disse myndigheders afgørelser kan indbringes for Almannastovan. Bestemmelsen i stk. 3 har også da gyldighed for almannastovans afgørelser, og bestemmelsen i stk. 4 har da tilsvarende gyldighed for oplysninger til den pågældende myndighed.

§ 9. Barnastyrkur ávirkar ikki veitingar til børn eftir lóggávuni annars.

§ 9. Børnetilskud påvirker ikke ydelser til børn efter anden lovgivning.

§ *10.* Krøv um barnastyrk kunnu ikki latast øðrum ella koma undir rættarsókn.

§ *10.* Krav på børnetilskud kan ikke overdrages eller gøres til genstand for retsforfølgning.

§ *11.* Barnastyrkur er skattafríur.

§ *11.* Børnetilskud er skattefrit.

§ *12.* Landsstýrið kann áseta nærri reglur um fyrisitingina av hesi løgtingslóg.

§ *12.* Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om administrationen af denne lov.

§ *13.* Landskassin rindar útreiðslurnar

§ *13.* Landskassen afholder udgifterne

til barnastyrk eftir hesi løgtingslóg.

§ *14.* Um mamman ella tann, sum sambært § 6 fær barnastyrkin goldnan, fær hjálp, sum er útroknað eftir ásetingunum í §§ 9 ella 13 í forsorgarlógini, fær viðkomandi eykabarnastyrk, sum er 750 kr. fyri fjórðingsárið. Eykabarnastyrkur verður goldin fyri tað fjórðingsárið har avvarðandi fyri eitt tíðarskeið hevur fingið hjálp sum nevnt í 1. punktum, og kann verða goldin á annan hátt enn frammanundan. Annars hava reglurnar um barnastyrk samsvarandi gildi fyri eykabarnastyrk.

§ *15.* Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin, tó so at barnastyrkur og eykabarnastyrkur verða goldnir fyrstu ferð frá og við oktober ársfjórðingi 1987.

til børnetilskud efter denne lagtingslov.

§ *14.* Hvis moderen eller den, der i henhold til § 6 får børnetilskuddet udbetalt, modtager hjælp, der er beregnet efter reglerne i §§ 9 eller 13 i forsorgsloven, får den pågældende et ekstra børnetilskud, som udgør 750 kr. i kvartalet. Det ekstra børnetilskud udbetales for det kvartal, i hvilket den pågældende for et tidsrum har modtaget hjælp som nævnt i 1. punktum, og kan udbetales på anden måde end forskudsvis. Iøvrigt finder reglerne om børnetilskud tilsvarende anvendelse for ekstra børnetilskud.

§ *15.* Denne lagtingslov træder i kraft straks, dog således at børnetilskuddet og det ekstra børnetilskud udbetales første gang fra og med oktober kvartal 1987.

Viðmerkingar:

Tá ið landsstýrissamgongan varð skipað í januar 1985, varð eitt av málunum, sum hon setti sær fyri at fáa dagrøktarskipanina útbygda, soleiðis at dagrøktarmammur, ið ansa annara børnum, kunnu fáa egin børn undir skipanina. Harumframt varð eisini samtykt at kanna møguleikan fyri at veita stuðul til foreldur, ið ansa børnum sínum heima og sostatt ikki nýta vøggustovu-, barnagarðs- ella dagrøktartilboð.

Almannastovan upplýsir, at tað er sera trupult og kostnaðarmikið, fyri ikki at siga ógjørligt, í løtuni at taka tey børn burturúr, sum ikki eru í barnagarði, vøggustovu ella undir dagrøkt, serliga tá ið summi foreldur nýta hesi tilboð eina tíð og so upp ímillum gera tað ikki, men ansa børnum sínum heima.

Landsstýrið hevur tikið hetta til eftirtektar, og tá ið vit vilja ikki bíða longur, verður komið við hesum uppskoti um barnastyrk til øll børn frá ½ ári til 16 ár, tí at hesin styrkur skuldi verið lættari at umsitið. Kanningarnar halda tó fram.

Her á landi er tað ein nýggj og vónandi betri familjupolitisk leið, sum komið verður inn á við hesum uppskoti, eins og við uppskotinum um barnsburðarhvíld við løn í ½ ár til allar mammur.

Uppskotini miða ímóti at geva familjuni, børnunum og mammuni høvi til at vera meira saman.

Tað verður serliga hugsað um smábarnafamiljuna og týdningin av, at tey fyrstu árini eru grundleggjandi. Tí verður skotið upp at veita størstu stuðulsupphæddina til børn í vøggustovualdri, frá ½ til 3 ár, nakað minni til børn í barnagarðsaldri, og uppaftur eitt sindur minni til børn í skúlaaldri. Sambært uppskotinum fáa børn frá ½ ári til 3 ár 8.800 kr. um árið í barnastyrki, frá 3-7 ára aldur 5.600 kr. og frá 7-16 ára aldur 4.800 kr.

Barnastyrkurin er skattafrír og inntøkujavnaður, soleiðis at hann kemur smá- og miðalinntøkuni til góðar.

Skotið er upp, at barnastyrkurin verður goldin fyrstu ferð frá og við oktober ársfjórðingi 1987. Meirútreiðslurnar fyri landskassan við hesum løgtingslógaruppskoti eru mettar at verða 48,3 mió. kr. árliga, og landsstýrið kemur samtíðis við uppskoti um, at barnafrádráttarin í landsskatti frá 1. januar 1988 heldur uppat. Hesin frádráttur er í løtuni 2.200 kr. fyri hvørt barnið og kostar landskassanum tilsamans 26 mió. kr.

Við hesum uppskoti um barnastyrk er sett á nakað nýtt, og tað er vón landsstýrisins, at tað við tíðini fer at bera til at økja um upphæddirnar til gagns fyri børnini og framtíð landsins.

1. viðgerð 9. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram hin 8. apríl 1987 av Føroya Landsstýri og aftan á 1. viðgerð hin 9. apríl beint í almanna- og heilsunevndina.

Saman við hesum uppskoti varð tingmál nr. 130/1986: Løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan eisini til viðgerðar. Uppskotið um barnastyrk er býtt sundur í trý, soleiðis at størsta veitingin er fyri børn frá hálvt til trý ár. Annar bólkur er børn, sum eru fylt trý ár, men ikki sjey ár, og triði bólkur er børn, sum, hava fylt sjey ár, men ikki 16 ár. Samstundis sum hesar veitingar verða settar í verk, er meiningin at taka burtur barnafrádráttin sbr. § 2 í útroknaða landsskattinum eftir § 1, nr. 1-6 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinni broytingum (tingmál nr. 130/1986).

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, ið tekur undir við uppskotinum frá landsstýrinum. Undir viðgerðini kom fram, at umframt tað, at tørvur er á peningaligum stuðli til familjur við børnum, so er eisini tørvur á einum almennum kjaki um, hvussu vit á besta hátt tryggja børnum trivnað í gerandisdegnum. Tað er tí ein samd almanna- og heilsunevnd, ið tekur undir við uppskoti landsstýrisins og samstundis setir soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta eina nevnd, ið viðger tilfarið, ið kom fram í ST-barnaárinum, eins og annað tilfar viðvíkjandi støðuni hjá børnum til tess at koma við tilmæli um, hvørji hyggjuráðini eru til at taka til tess at stimbra trivnað og vælferð hjá øllum børnum í landinum.

2. viðgerð 13. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 28-0 atkvøðum, §§ 2-15 samtyktar við 28-0 atkvøðum. Við 28-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Lógin endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-31. Lóg nr. 50 frá 5. mai 1987

135 Landsstýrismál (52/85)

Ár 1987, hósdagin 9. apríl legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. februar 1986 og beint í landsstýrismálanevndina.

Gerðabókin fevnir yvir tíðarskeiðið frá 6. august 1984 til 8. januar 1985, sum var seinasti fundur hjá undanfarna landsstýri, og frá 1. fundi hjá hesum landsstýrinum tann 10. januar 1985 til 26. juli 1985.

Ein samd nevnd (Hergeir Nielsen, Tummas Arabo og Óli Breckmann) førir fram:

6. august 1984 verður samtykt at biðja um heimild til at nýta 40.000 kr. av konto § 22, 22104/203507, umboðan, til gerð av lyftu til brekað ítróttarfólk.

Hildið verður, at eitt álvarsligt brek kemur til sjóndar við at nýta tey minni mentu til politiskt skálkaskjól.

Lagt kann verða aftrat, at áðurnevnda konto var yvirtrekt upp á 986.000 kr. hetta árið, av eini játtan upp á 500.000 kr.

Rímiligari og politiskt reinførari hevði verið at játtað hesa upphædd av sama rakstrarstaði, men konto landsstýrisins at ráða yvir.

Tann 6. august, tá ið avgerðin verður tikin, eru 533.000 kr. nýttar av kontoini.

6. august 1984 er ein 5 ára havnaætlan fyri útbygging av útoyggjahavnum á skránni til landsstýrisfund. Málið verð útsett, og var hetta tað næmasta, ið komið var eini 5 ára havnaætlan fyri útoyggjahavnir.

6. august 1984 var ein 8 ára havnaætlan á skránni til landsstýrisfund. Málið varð útsett, og var hetta tað næmasta, ið komið varð eini 8 ára havnaætlan.

11. oktober 1984 samtykti landsstýrið at søkja figgjarnevndina um eina fyribilsjáttan upp á 160.000 kr. til landfútaskrivstovuna. Upphæddin skuldi nýtast til lønir til tíðarskeiðið 1. november 1984 til 1. mai 1985.

Fútin hevur vent sær til landsstýrið um figgjarliga hjálp, tí at ríkismyndugleikarnir ikki vilja rinda fyri m.a. lønir á skipaskráseting ini. Fútin vil fegin varðveita sín myndugleika á hesum øki, hóast talan er um eitt yvirtikið málsøki. Tað var sett á lista A í 1948.

Fyri at kunna umsita skrásetingina av partafeløgum, feløgum, handilsfeløgum og firmaum er fútaskrivstovan flutt út úr sínum hølum í løgreglubygningin um á Friutrøð og niðan á Háls, har hann hevur leigað seg inn hjá Føroya Brunatrygging.

Inntøkugrundarlagið hjá skipaskráseting ini er so at siga einki, tí at avgjøldini eru tey somu sum í 1937. Útreiðslurnar eru niðan fyri 1 mió. kr. og kundu ruddiliga verið bornar av tíðarførdum avgjøldum. Málsøkið eigur ikki at kosta pening og eigur at vera umsitið av føroyskum myndugleikum.

Avgerðin hjá undanfarna landsstýrið um at játta figgjarliga luttøku í virkseminum á fútaskrivstovuni var sera óheppin, serliga tá ið havt verður í huga, at ríkisumboðsmaðurin fyri stuttum í løgtinginum boðaði frá, at luttøka av føroyskt settum politistum saman við teimum, ið eru undir valdi fútans, ikki kundu góðtakast av fútanum sjálvum.

Málið eigur tí at takast uppaftur sum skjótast, soleiðis at fútaskrivstovan sleppur omanaftur í løgreglubygningin á Friutrøð, har hon náttúrliga hoyrir heima og ikki noyðist at leita niðun á Háls fyri m.a. at umsita eitt reint føroyskt málsøki, sum harafturat lutvíst er goldið av landskassanum.

Tinglýsingina umsitur sorinskrivaraskrivstovan. Henda gevur eina inntøku

upp á 2 mió. kr. árliga, men kundi givið vel meiri við tíðarfordum avgjald um. Útreiðslurnar liggja niðan fyri 1 mió. kr.

Tinglýsingin er eins og skipaskrásetingin sett á lista A í 1948 og eigur sostatt eisini at vera umsitin av føroyskum myndugleikum, og kann hetta virksemi sostatt fáast í rættlag saman við skrásetingini.

6. december 1984 samtykti landsstýrið eina reglugerð fyri leiðaran av bygdaleiðum. Av ókendum orsøkum varð tilskilað í hesi samtykt, at hendan reglugerð ikki skuldi skerja myndugleikan hjá Strandfaraskipum Landsins.

Av ókendum orsøkum hevur leiðarin av bygdaleiðum enn ikki dagan í dag fingið hesa reglugerð frá Føroya Landsstýri.

21. december 1984 verður 30% studulslán játtað til feskfiskatrolara. Sáttmálaprísur 41 mió. kr. Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, tekur ikki undir við hesum máli og vísir í gerðabókini á, at málið ikki er viðgjørt. Hetta fer fram, meðan samgongusamráðingar fara fram millum aðrar flokkar um skipan av nýggjum landsstýri.

28. december 1984, ella eina viku seinni, ásannar sama landsstýrið í sambandi við viðgerðina av einum øðrum skipamáli, at tað ikki letur seg gera at viðgera umsóknir av hesum slagi undir verandi umstøðum.

Ein meiriluti (Hergeir Nielsen og Tummas Arabo) førir fram:

Av hesum skilst, at eina viku eftir eina týdningarmikla avgerð í einum prinsippmáli fellur ein avgerð eina viku seinni um at taka júst mótsetta prinsipp í nýtslu.

Á fundinum tann 21. december 1984 verður tikin avgerð um fígging av skipi, hóast málið ikki er viðgjørt. Á fundinum tann 28. december 1984 verður eingin avgerð tikin vísandi til serligu umstøðurnar. Í báðum førum er talan um at taka týdningarmiklar avgerðir í eini tíð, har eitt landsstýri ikki hevur parlamentariskan meiriluta aftan fyri seg.

Minnilutin (Óli Breckmann) førir fram, at eitt farandi landsstýri situr við fullum fyrisitingarligum myndugleika, skyldum og rættindum, til eitt nýtt landsstýri, valt av løgtinginum, tekur við.

Avgerðin at veita 30% studulslán 21. december til ein vanligan feskfiska trolara, bygdur á føroyskari skipasmiðju, er tí meira náttúrlig og minni prinsipiell, enn um stuðulslán varð veitt til verksmiðjutrolara til lítið roynt fiskaslag tann 28. december, tá samráðingar um nýtt landsstýri vóru komnar undir land.

Í september og allan oktober mánað í 1984 stóð skúla- og íløttarhøllin í Trongisvági á skránni hjá landsstýrinum. Endaliga samtyktin gjørdist hon, at samtykt varð at taka undir við landsskúlafyrisitingini og játta 30% av 16,2 mió. kr. í studningi.

Avgerðin víkir frá vanligum praksis, har játtað hevur verið samsvarandi studningsupphædd, sum landsskúlaráðið hevur mælt til, ella 30% av 25,8 mió. kr.

Byggiroknskapurin var tann 22. januar 1985 uppgjørdur til 26,5 mió. kr. av einum mettum kostnaði, áðrenn farið varð undir byggingina, upp á 13,2 mió. kr. Sjálv byggingin gjørdist sostatt dupult so dýr, sum mett varð frammanundan, men er hetta vanligt fyribrigdi í sambandi við skúla- og ítróttahallabyggingar í Føroyum.

Aðrar útreiðslur, sum ikki vóru við upprunaliga, so sum kloakk, reinsiverk, innrættan av kjallara, innbúgv, arkitoktar, sakførarar, rentur v.m., hava síðan dýrkað byggingina upp í 34,4 mió. kr.

Tað er rætt, at skeivt varð borið at frá kommunalari síðu. M.a. var farið undir eitt projekt, sum var 1.000 m² størri enn tað upprunaliga, og er tað tá ikki rætt at játta studning aftaná.

Hinvegin so er henda framferðin við broyttum projektum einki eindømi innan fyri skúla- og ítróttahallabygging, fyri ikki at tala um skipabygging.

Vísandi til vanliga mannagongd í tilikum málum mælir meirilutin (Hergeir Nielsen og Tummas Arabo) til, at landsstýrið tekur málið um studningsjáttan til Tvøroyrar kommunu upp til nýggja viðgerð.

Minnilutin (Óli Breckmann) førir fram, at tað hevur verið vanlig mannagongd at byggja eftir somu tekningum, sum myndugleikarnir hava góðkent og játtað pening til. Undanfarna býráð á Tvøroyri brúkti eitt sett av tekningum til at søkja stuðul og byggiloyvi til, mett til 13,2 mió. kr., men eitt annað sett at byggja eftir, sum hevur kostað 35 mió. kr.

Landsstýrið og ríkismyndugleikar hava rætt at taka endaliga avgerð um lagnuna av slíkari ólógligari bygging í seinasta enda, antin reglurnar verða fylgdar, ella frávik verður gjørt.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja soljóðandi uppskot til samtyktar við teimum viðmerkingum, ið her eru førdar fram:

uppskot

til

samtyktar

Gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 6. august 1984 — 26. juli 1985 verður samtykt.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð viðgjørt saman við tingmáli nr. 29: Landsstýrismál. Bæði vórðu beind beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið varð samtykt við 21-0 atkvøðum

136 Løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisiting av handils- og skrivstovuyrki

Ár 1987, hósdagin 9. apríl legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið.

lagtingslov om grunduddannelse indenfor administrations-, handels- og kontorområdet.

§ *1.* Landsstýrinum verður sambært § 2 í rammulóg nr. 54 frá 14. februar 1979 heimilað at skipa fyri grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til i medfør af § 2 i rammelov nr. 54 af 14. februar 1979 at etablere grunduddannelse indenfor administrations-, handels- og kontorområdet.

§ 2. Útbúgvingin byrjar við eini støðisútbúgving á handilsskúla, ið vanliga tekur eitt ár. Endamálið við hesi undirvísing er at geva næmingum grundleggjandi innlit í og kunnleika til fyrisitingar-, handils- og skrivstovuyrki. Í sambandi við støðisárið kann verða skipað soleiðis fyri, at næmingar í ávís tíðarskeið fara út á arbeiðsplóss.

2. stk. Umframt ta fakligu undirvísingina verður undirvíst í almennum lærugreinum og evnum, sum m.a. miða ímóti at geva næmingunum kunnleika til arbeiðsviðurskifti og til samfelagið sum heild.

3. stk. Tá støðisárið er lokið, fer víðari útbúgving, ið tekur 2 ár, skiftivís fram á skúlum og á upplæringarplássum,

§ 2. Undervisningen begynder med en basisuddannelse på handelsskole, der sædvanligvis tager et år. Formålet med denne undervisning er at give eleverne grundlæggende indblik i og kendskab til administrations-, handels- og kontorerhvervene. I forbindelse med basisåret kan ordningen være den, at eleverne i visse tidsrum kommer ud på arbejdspladser.

Stk. 2. Udover den faglige undervisning undervises der i almene fag og emner, som bl.a. har det formål at give eleverne kendskab til arbejdsforhold og til samfundet som helhed.

Stk. 3. Når basisåret er gennemgået, foregår den videre uddannelse, som ta-

har høvuðsdenturin verður lagdur á ta praktisku upplæringina. Landsskúlaráðið kann í einstøkum førum geva loyvi til, at 2. partur í høvuðsheitum ella bert fer fram á skúla.

4. stk. Útbúgvingin eigur at verða uppbygd á ein slíkan hátt, at næmingur á hóskandi stigi kann gevast við útbúgvingini við rætti at fara til annan lesnað ella í vinnu, og soleiðis at hann seinni kann halda fram við uppruna ligu útbúgving síni.

5. stk. Brekaðir næmingar kunnu fáa serundirvising ella annan sernámsfrøðiligan stuðul eftir nærri av landsskúlaráðnum ásettum reglum.

6. stk. Eisini eiga næmingar at kunna fáa leiðbeining um val av útbúgving og yrki og um persónlig viðurskifti.

§ 3. Landsstýrið ásetir nærri reglur um upptøku av næmingum, undirvising og prógtøku.

2. stk. Landsskúlaráðið ásetir nærri reglur um viðurskiftini annars hesi útbúgving viðvíkjandi.

§ 4. Sáttmálin um upplæringarpláss, sum aftan á stoðisárið verður gjørdur millum næming og upplæringarpláss, skal vera skrivligur, og skal lønin til næmingin vera ásett í sáttmálanum.

2. stk. Lønin verður ásett eftir sáttmála millum arbeiðsgevara- og arbeiðstakarafeløgini. Er eingin sáttmáli, ásetir landsstýrið, hvussu lønin eigur at verða roknað.

3. stk. Læraraðið ásetir nærri reglur um, hvussu upplæringaravtalurskuft

ger 2 ár, skiftevis på skoler og i praktikpladser, hvor hovedvægten lægges på den praktiske oplæring. Landsskolerådet kan i enkelte tilfælde give tilladelse til, at 2. del hovedsagelig eller udelukkende foregår på skole.

Stk. 4. Uddannelsen skal være opbygget på en sådan måde, at en elev på et passende trin kan ophøre med uddannelsen med ret til at fortsætte i en anden uddannelse eller i et erhverv, og således at den pågældende senere kan fortsætte med sin oprindelige uddannelse.

Stk. 5. Handicappede elever kan få særundervisning eller anden specialstøtte efter nærmere regler, som undervisningsrådet fastsætter.

Stk. 6. Elever skal også kunne få vejledning om valg af uddannelse og erhverv og om personlige forhold.

§ 3. Landsstyret fastsætter nærmere regler om optagelse af elever, undervisning og eksamen.

Stk. 2. Undervisningsrådet fastsætter nærmere regler om de øvrige forhold vedrørende denne uddannelse.

§ 4. Aftalen om praktikplads, som efter basisåret indgås mellem elev og praktikplads, skal være skriftlig, og elevens løn skal fastsættes i aftalen.

Stk. 2. Lønnen fastsættes ifølge overenskomst mellem arbejdsgiver og arbejdsgiverforeningerne for hvert område for sig. Findes der ingen overenskomst, fastsætter landsstyret, hvorledes lønnen skal beregnes.

Stk. 3. Lærerådet fastsætter nærmere regler om, hvorledes praktikaftaler af

ljóða. Lærurâðið kann skipa fyri skrá seting av upplæringarplássum og eftirliti við, at upplæringaravtalur verða hildnar.

§ 5. Góðkenning av upplæringarplássum fer fram, og møgutigar ósemjur millum næming og upplæringarpláss verða at avgera eftir reglunum í lærlingalógini.

§ 6. Landsstýrið kann eftir tilmæli frá víðkaða lærurâðnum seta forboð fyri at gera lærusáttmálar sambært deild IV í lóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti við seinni broytingum í ávísum tíðarskeiðum í ávísum økjum í landinum.

§ 7. Henda lóg hevur gildi frá 1. august 1986.

praktikpladser og tilsyn med, at praktikkatbaler overholdes.

§ 5. Godkendelse af praktikpladser foretages, og mulige uoverensstemmelser mellem elev og praktikplads afgøres efter reglerne i lærlingeloven.

§ 6. Landsstyret kan efter indstilling fra det udvidede lærerâd nedlægge forbud mod, at der indgås lærekontrakter i medfør af afsnit IV i lov nr. 29 af 12. oktober 1954 om lærlingeforhold med senere ændringer i bestemte tidsrum i bestemte dele af landet.

§ 7. Denne lov har gyldighed fra 1. august 1986.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið nr. 69 frá 30. juni 1983, § 7, er ásett, at lógin, sum kom í gildi 1. august 1983, fyri bils skuldi hava gildi til 1. august 1986, og í viðmerkingunum til uppskotið til hesa løgtingslóg varð tilskilað, at orsøkin til, at løgtingslógin varð gjørd tíðaravmarkað, var hon, at henda grundútbúgving í fyrstu syftu var ætlað sum ein roynd, ið skuldi geva rúm fyri eini yrkismiðaðari støðisútbúgving innan lærugreinaøki handilsskúlans í tí partinum av landinum, haðani næmingarnir høvdu tilgongd til handilsskúlan í Tórshavn.

Landsskúlafyrisitingin hevur boðað landsstýrinum frá, at landsskúlarâðið á fundi 10. november 1986 hevur viðgjørt málið um FHS-útbúgvingina, og at râðið tá var á einum máli um, at 3 ára royndartíðin fyri hesa útbúgving hevur verið ov stutt, og tí mælti til, at royndarskeiðið verður longt við 2 árum til 1. august 1988, soleiðis at støða til ta tíð kann verða tikin til hetta royndartiltakið í sini heild.

Eftir hesum leggur landsstýrið fyri løgtingið eitt uppskot til løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið, sum er samlikt nevndu løgtingslóg nr. 69/1983, tó so at nýggja løgtingslógin eftir § 7 í uppskotinum fær gildi 1. august 1986 í beinleiðis framhaldi av løgtingslógini nr. 69/1983, og so at nýggja løgtingslógin ikki verður tíðaravmarkað.

Landsstýrið er tó samt við landsskúlarâðið í, at løgtingslógin verður endur-

skoðað, um og tá tørvur verður mettur at vera á hesum, til dømis í løgtingssetuni 1987.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 10. apríl 1987. § 1 varð samtykt við 27-0 atkvøðum, §§ 2-7 samtyktar við 27-0 atkvøðum. Við 28-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 13. apríl. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2128-5-8-1. Lóg nr. 49 frá 5. mai 1987.

137 Gjald fyri ferðing úr Føroyum

Ár 1987, hósdagin 9. apríl legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um gjald fyri ferðing úr Føroyum.

§ *1.* Tey, ið ferðast úr Føroyum, hava skyldu at lata 200 kr. í avgjaldi til landskassan fyri hvørja ferðina. Gjaldið kann eftir avtalu við flutningsfelagið krevjast sum meðalgjald, um felagið svarar fyri gjaldinum.
2. stk. Undantikin gjaldinum eru tey, ið ikki ferðast við skipi ella flogfari í fastari farleið, ferðafólk í transitt og børn undir 15 ár.
3. stk. Landsstýrið ásetir tær reglur, ið skulu til at tryggja, at gjøldini koma inn.

§ *2.* Henda lóg fær gildi 1. juni 1987, samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 1979 um avgjøld av ferðaseðlum við broytingum.

lagtingslov om afgift på rejser fra Færøerne.

§ *1.* De, der rejser fra Færøerne, er pligtige til at betale 200 kr. i afgift til landskassen for hver rejse. Afgiften kan efter aftale med vedkommende selskab indkræves som en gennemsnitsafgift, såfremt selskabet indestår for afgiften.
Stk. 2. Undtagne fra afgiften er de, der ikke rejser med skib eller luftfartøj i fast rute, transitpassagerer og børn under 15 år.
Stk. 3. Landsstyret fastsætter de regler, der er nødvendige at sikre, at afgifterne indgår.

§ *2.* Denne lov træder i kraft 1. juni 1987, samtidig træder ud af kraft lagtingslov nr. 33 af 19. maj 1979 om afgifter på billetter med ændringer.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 14/1986: Gjald av ferðaseðlum samtykti løgtingið løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um avgjøld av ferðaseðlum.

Eftir lógini, soleiðis sum hon varð broytt, er landsstýrinum heimilað at áseta reglur um gjald til landskassan upp á 200 kr. av uttanlandsferðaseðlum úr Føroyum, tó eru børn undir 15 ár og ferðafólk í transitt undantikin.

Tá ið upprunalógin frá 1979, sum legði gjald á ferðaseðlar bæði frá og til Føroyar, kom í gildi, var ivi um, um heimastýrið hevði heimild at leggja gjald á ferðaseðlar, ið ikki vórðu seldir í Føroyum. Ivi gjørdi tað, at lógin ongantíð varð sett í verk.

Sami ivin er nú, tá broytta lógin skal praktiserast. Lóggávuvald heimastýrisins røkkur eftir teimum kanningum, sum gjørdar eru, bert til tað saluvirksemi, sum fer fram í Føroyum, og røkkur tí ikki at gjaldleggja ferðaseðlar seldir aðrastaðni.

Hinvegin verður mett, at heimastýrið kann áleggja hvørjum ferðafólki, ið ferðast frá Føroyum, eitt gjald.

Eftir uppskotinum verður gjaldið 200 kr. fyri øll tey, sum ferðast frá Føroyum við skipi ella flogfari í fastari farleið, t.v.s. eftir lýstari ferðaætlan fyri ávist tíðarskeið, børn undir 15 ár og ferðafólk í transitt undantikin. Eisini eru tey undantikin, sum ferðast undir leigu- ella chartertreytum, koma og fara við rundfaraskipum ella ferðast undir tilsvarandi treytum.

Lógin er eisini at skilja soleiðis, at t.d. skipafeløgini, ið sigla við ferðafólki, sum selja ferðaseðlar fyri ymiskar prísir frá einmanskamari til liggistól, kunnu gera avtalu við landsstýrið um, at tey standa inni fyri gjaldinum, feløgini kunnu tá leggja gjaldið við ymiskari vekt á ferðaseðlarnar.

Kann vera, at lógin førir innkrevjingar- og eftirlitsútreiðslur til starvsfólk við sær.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 9. apríl 1987 og undir 1. viðgerð tann 11. í sama mánaði beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meirilutа og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Tordur Niclasen og Asbjørn Joensen) tekur undir við uppskotinum.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 14. apríl. § 1 varð samtykt við 17-0 atkvøðum. §§ 2-4 samtyktar uttan atkvøðugreiðslu. Við 17-3 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 451-1. Lóg nr. 23 frá 30. apríl 1987.

138 Uppskot til løgtingslóg um Menningarstovu

Ár 1987, hósdagin 9. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um Menningarstovu.

§ *1.* Landsstýrinum er heimilað at seta á stovn menningarstovu undir heitinum Menningarstova Landsins.

§ *2.* Menningarstovan hevur til endamáls at menna ídnað, handverk og tænastuvirksemi, í sambandi við hetta ráðgeving innan tøkni, búskap, útflutning av vørum og skeiðvirksemi. Hetta virksemi verður innan karmarnar fyri setta vinnulívspolitikkinum.

§ *3.* Stjórin fyri Menningarstovuni verður settur av landsstýrinum. Stjórin hevur dagligu leiðsluna á stovuni og setur starvsfólk og serkøna hjálp. Stjórin frágreiðir beinleiðis til landsstýrið.
2. stk. Løn til stjóra og starvsfólk og samsýningar til nevndarlimir skulu góðkennast av landsstýrinum.

§ *4.* Heimilað verður landsstýrinum at skipa eitt menningarráð.
2. stk. Í menningarráðnum sita 15 limir.
3. stk. Menningarráðslimirnir verða valdir millum

lagtingslov om Menningarstova.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at oprette et udviklingskontor under betegnelsen: Landets Udviklingskontor.

§ *2.* Udviklingskontoret har til formål at udvikle industri, håndværk og servicevirksomhed, i denne forbindelse rådgivning inden for teknik, økonomi, vareeksport og kursusvirksomhed. Denne virksomhed foregår inden for rammerne af den fastsatte erhvervspolitik.

§ *3.* Udviklingskontorets direktør ansættes af landsstyret. Direktøren har den daglige ledelse af kontoret og ansætter personale og sagkyndig assistance. Direktøren refererer direkte til landsstyret.
Stk. 2. Løn til direktør og personale samt godtgørelser til rådets medlemmer skal godkendes af landsstyret.

§ *4.* Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et udviklingsråd.
Stk. 2. Udviklingsrådet har 15 medlemmer.
Stk. 3. Rådets medlemmer udnævnes blandt

a) vinnulívsfólk, sum í verki hava sýnt hepni og skil at ganga nýggjar leiðir og menna síni virki,

b) fólk í almennum og hálvalmennum starvi, sum hava beinleiðis samskifti við vinnulívið, og

c) fólk við góðum innliti í vinnuskúlamál.

4. stk. Menningarráðslimirnir verða valdir fyri 3 ár. Tá 2 ár eru liðin, fara við lutakasti teir fyrstu 5 limirnir frá, tá 3 ár eru liðin teir næstu 5, og tá 4 ár eru liðin teir seinastu 5. Við nývali av menningarráðslimum koma leiðsla menningarstovunnar og verandi menningarráðslimir við uppskotum um nýggjar limir. Menningarráðslimir kunnu veljast aftur, men ikki fyrr enn annað árið eftir, at teir eru farnir úr ráðnum.

a) erhvervsfolk, som har haft en heldig hånd med at forsøge nye udviklingsmuligheder og udvikle egne virksomheder,

b) folk i offentlige og halvoffentlige stillinger, som har direkte kontakt med erhvervslivet, og

c) folk med god indsigt i erhvervsskolernes forhold.

Stk. 4. Rådets medlemmer bliver valgt for en periode af 3 år. Efter lodtrækning udgår de første 5 medlemmer efter 2 år, efter 3 år de næste 5 og efter 4 de sidste 5 medlemmer. Ved nyvalg af medlemmer har udviklingskontorets ledelse og medlemmer af rådet ret til at stille forslag om nye medlemmer. Genvalg til rådet kan finde sted, men ikke før der er gået et år, siden den pågældende har forladt rådet.

§ 5. Til at skipa fyri arbeiðinum millum fundirnar hjá menningarráðnum verður valt eitt stýri. Landsstýrið velur formannin í stýrinum.

2. stk. Menningarráðið velur millum limir sínar 4 limir í stýrið.

3. stk. Stýrislimirnir, ið menningarráðið velur, verða valdir fyri 4 ár. Tá 3 ár eru farin, fer við lutakasti 1 limur út. Tá 4 ár eru farin, fer annar av teimum 4 fyrstvaldu út. Tá 5 ár eru farin, fer triði limurin út, og tá 6 ár eru farin, fer seinasti av teimum 4 fyrstvaldu út. Stýrislimir kunnu veljast aftur, men ikki fyrr enn annað árið eftir, at teir eru farnir úr stýrinum.

§ 5. Til at forestå arbejdet mellem udviklingsrådets møder vælges en bestyrelse. Landsstyret vælger formanden for bestyrelsen.

Stk. 2. Udviklingsrådet vælger blandt sine medlemmer 4 medlemmer til bestyrelsen.

Stk. 3. De bestyrelsesmedlemmer, der vælges af udviklingsrådet, vælges for en periode på 4 år. Efter 3 år udgår 1 medlem ved lodtrækning. Efter 4 år den næste. Efter 5 år den næste og endelig efter 6 år den sidste af de førstvalgte. Genvalg kan finde sted, men ikke før der er gået 1 år, siden den pågældende har forladt bestyrelsen.

§ 6. Fíggjarliga støðið undir menning-

§ 6. Udgifter i forbindelse med Udvik-

arstovuni er árliga játtanin á løgtingsfiggjarlógini og samsýning fyri veittar tænastur.

2. stk. Landsstýrið kann áseta reglur um gjald fyri veittar tænastur.

3. stk. Menningarstovan kann við stuðli og í samstarvi við kommunurnar seta fólk úti um landið til at skipa fyri virksemi sambært § 2.

lingskontorets arbejde bevilges årligt på finanslagtingsloven.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regulativer for gebyrer for udførte tjenester.

Stk. 3. Udviklingskontoret kan med støtte fra og i samarbejde med kommunerne ansætte folk lokalt til at udføre opgaver i henhold til § 2.

§ *7.* Menningarstovan gevur frá sær á hvørjum ári, 15. mars, roknskap og ársfrágreiðing um virki stovunnar, sum verður at almannakunngera.

§ *7.* Udviklingskontoret udfærdiger hvert år inden den 15. marts en årsberetning om kontorets arbejde i det foregående år, som offentliggøres.

§ *8.* Landsstýrið ger eftir uppskoti frá stýrinum og menningarráðnum í felag reglugerð fyri stovu, ráð og stýri.

§ *8.* Landsstyret udfærdiger, efter forslag fra udviklingskontoret og udviklingsrådet, et regulativ for kontoret, rådet og bestyrelsen.

§ *9.* Øll, ið virka á menningarstovuni og somuleiðis í ráði og stýri, hava tagnarskyldu við tí, tey í starvi teirra á stovuni, í ráði ella stýri verða kunnug við.

§ *9.* Alle ansatte på udviklingskontoret og ligeledes medlemmer af råd og bestyrelse har tavshedspligt med hensyn til forhold, de måtte blive bekendt med under arbejdet for institutionen.

§ *10.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *10.* Denne lov træder i kraft dagen efter, den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Seint á sumri 1977 setti landsstýrið eina starvsnevnd við fimm limum at kanna viðurskiftini hjá iðnaðinum í Føroyum.

Til at vera bindilið millum starvsnevndina og iðnaðin varð ein umboðsnevnd vald av 10 umboðum fyri vinnulívið. Henda umboðsnevnd skuldi tryggja, at starvsnevndin fekk tað tilfar, sum tørvur var á.

Nevndin læt landsstýrinum álit í december 1978. Hetta álit var sera umfatandi. Tað bygdi á eina nágreiniliga lýsing av støðuni hjá so at siga øllum vinnugreinum. Tað hevði tilmælir um málsviðgerð av projektum, um hjálpartænastu, um sølu- og marknaðarføring, útbúgving og framtaksleiðir.

Í sambandi við hjálpartænastuna hevði ídnaðarnevndin kannað viðurskiftini í okkara grannalondum, eitt nú í Íslandi og Hetlandi. Á síðu 96 í álitinum kom nevndin til ta niðurstøðu, at vit eiga at stovna eina Menningarstovu, sum skal veita føroyska vinnulívinum hjálp og ráðgeving. Ídnaðarálitið mælir til, at ein nevnd við fimm limum verður vald at stýra stovuni, og at eitt umboðsráð við 17 umboðum fyri vinnulívið verður skipað. Hetta umboðsráð skal eftir álitinum verða ráðgevandi hjá nevndini og stjóranum og halda fund minst tríggjar ferðir um árið.

Í ídnaðarálitinum verður mett, at tað er av týdningi, at lógir og reglugerðir um Menningarstovuna verða gjørdar fleksiblar, so at broytt viðurskifti ikki koma at tarna einari skynsamari fyrisiting. Um manning á Menningarstovuni verður sagt, at í fyrsta umfari eiga eini fýra til fimm fólk at setast, harav tvey ella trý hava breiða tekniska/búskaparliga útbúgving. Harafturat eiga tey eisini at hava hollan praktiskan kunnleika.

At enda verður sagt í ídnaðarálitinum, at úrslitið av eini tílíkari broyting hevði verið, at Ídnaðarstovan varð eitt sekretariat hjá limunum í ídnaðarfelagnum og umboðaði ídnaðin mótvegis tí almenna og umheiminum, meðan Menningarstovan fór at fevna um allar partar av vinnulívinum. Serstakliga skuldi hon tó nýtt orku sína til kanningar av øktum virkismøguleikum og ráðgeving í sambandi við innkoyring av nýggjum virkjum.

Fyri umleið einum ári síðani hevði landsstýrið samráðingar við Føroya Ídnaðarfelag, og eru viðurskiftini millum felagið og landsstýrið fingin í rættlag. Ímóti gjaldi yvirtók landsstýrið innbúgvið á Ídnaðarstovuni, og avtalað varð gjørd um, at Føroya Ídnaðarfelag fær eitt skrivstovuhøli á Ídnaðarmiðstøðini. Eisini fekk felagið tilsøgn um skrivarahjálp frá Menningarstovuni, so leingi felagið ikki hevur sett tann ætlaða skrivaran.

Eftir hjálagda uppskoti til løgtingslóg um Menningarstovu Landsins verður heimilað landsstýrinum at skipa eitt menningarráð við 15 limum. Hesir skulu veljast millum vinnulívsfólk, fólk í starvi hjá almennum og hálvalmennum virkjum og fólk við innliti í vinnuskúlamál. Menningarráðið, sum skal vera ráðgevandi hjá stjóranum og stýrinum, kemur ætlandi saman tvær til fýra ferðir um árið.

Til at skipa fyri arbeiðinum millum fundirnar hjá menningarráðnum verður valt eitt stýri við fimm limum. Landsstýrið velur formannin. Hinir fýra limirnir verða valdir millum umboðsráðslimirnar.

Eftir gr. 6, 2. stk. kann Menningarstovan við stuðli og í samstarvi við kommunur í ávísum nærri avmarkaðum økjum seta fólk úti um landið til at skipa fyri virksemi sambært gr. 2. Ætlanin er, at nærri reglur hesum viðvíkjandi verða ásettar í kunngerð.

Endamálið hjá Menningarstovuni er at menna ídnað, handverk og tænastuvirksemi og í sambandi við hetta at veita ráðgeving innan tøkni, búskap, útflutning av vørum og skeiðvirksemi.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 13. apríl lugði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 9. apríl 1987 og undir 1. viðgerð tann 10. í sama máuað beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Sverri Midjord og Henrik Old) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Olaf Olsen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Eilif Samuelsen) førir fram, at tað má metast at vera spell, at ídnaðarstovan ongantið fekk umstøður til at virka eftir ætlan, tí Sambands flokkurin meinar, at vinnulívsmenn sjálvir áttu at skipað sína egnu viðurskifti á skilabesta hátt við einum ávísum stuðli frá tí almenna.

Nú er so ídnaðarstovan avtikin sum ráðgevandi stovnur, og fyri sitandi landsstýri er at siggja til einki hent á ídnaðarøkinum síðani 1977. Tí hava teir einki annað uppskot enn eitt 10 ára gamalt stavandi frá ídnaðarálitinum.

Ásannandi, at landsstýrið legði málið fram 10. apríl, og at øll víðari avgreiðsla av málinum skuldi hurlast ígjøgnum dagin eftir, og ásannandi annars tær ósømiligu arbeiðsumstøður, landsstýrið hevur boðið løgtinginum hesar seinastu dagarnar, hevur málið ikki fingið nakra veruliga viðgerð.

Minnilutin (Eilif Samuelsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 13. apríl. § 1 samtykt við 24-0 atkvøðum. §§ 2-10 samtyktar við 19-0. Við 19-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. apríl. Málið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

Lóg nr. 46 frá 5. mai 1987.

139 Løgtingslóg um útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudning til ávísar pensiónistar o.o.

Málið ikki framlagt.

140 Val av álitsmonnum og nevndum

Sí bls. 37

141 Veiting av ríkisborgararætti

Landsstýrið hevur við skrivum dagfestum 2. december 1985, 3. januar 1986, 1. apríl 1986, 14. august 1986 og 23. januar 1987 eftir áheitan ríkisumboðsmansins lagt fyri tingið spurningin um viðmerkingar til lóg nr. 5 frá 7. november 1984, lóg nr. 2 frá 22. mai 1985, lóg nr. 4 frá 6. november 1985, lóg nr. 1 frá 19. februar 1986, lóg nr. 2 frá 4. juni 1986 og lóg nr. 4 frá 18. november 1986 um veiting av ríkisborgararætti.

Málið varð beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið, og sum hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin setir fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Lóg nr. 5 frá 7. november 1984, lóg nr. 2 frá 22. maj 1985, lóg nr. 4 frá 6. november 1985, lóg nr. 1 frá 19. februar 1986, lóg nr. 2 frá 4. juni 1986 og lóg nr. 4 frá 18. november 1986 verða lýstar at galda í Føroyum.

Minnilutin (Hans Jacob Debes) greiðir frá støðu síni í tingsalinum.

1. viðgerð 13. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 14. apríl 1987. Uppskotið varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 508-3

142 Løgtingslóg um landsjørð (lm 88/1985)

Ár 1987, mánadagin 13. apríl legði landbúnaðarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 2. mars 1986 og við 1. viðgerð 4. apríl s.á. beint í landbúnaðarnevndina.

Landbúnaðarnevndin hevur arbeitt sum millumtinganevnd og hevur viðgjørt málið og havt fundir við Jarðarráðið um uppskotið og aðrar spurningar jarðarbrúkinum viðvíkjandi.

Eisini hevur nevndin eftir áheitan fingið skrivlig ummæli frá Jarðarráðnum, Bóndafelagnum, Búnaðarfelagnum og Føroya Kommunufelag.

Málið varð lagt fram av landbúnaðarnevndini tann 13. apríl 1987 og við 1. viðgerð tann 14. apríl beint í landbúnaðarnevndina.

Málið er ógvuliga umfatandi og viðbrekið, og metir nevndin seg ikki vera komna á mál og skjýtur ti upp, at nevndin verður gjørd til millumtinganevnd til framhaldandi viðgerð av málinum, og setir sostatt fram

uppskot

til

samtyktar

Landbúnaðarnevnd Løgtingsins verður millumtinganevnd til framhaldandi viðgerð av løgtingsmáli nr. 142/1986: Løgtingslóg um landsjørð og leggur málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni 1987.

2. viðgerð 14. apríl. Uppskotið til samtyktar samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1700-9

143 Loysn av arbeiðsósemju

Ár 1987, fríggjadagin 29. mai legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um framleingjan av ávissum lønarsáttmálum og avtalum o.m.

§ 1.

Sáttmálar um lønar- og arbeiðsviðurskifti millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og Arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður, ið vóru galdandi til 1. mai 1987, smbr. eisini løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 1985, verða framlongdir at galda til 1. mai 1989 við fylgjandi broytingum:

1) Frá 1. mai 1987 hækkar grundlønin við 2,75 kr. um tíman.
2) Frá 1. mai 1968 hækkar grundlønin við 2,75 kr. um tíman.
3) Hækkingin uppá 1% av tí til eina og hvørja tíð galdandi løn verður broytt til 0,9%.
4) 1%, ið eftir sáttmálanum frá 1985 millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag skuldi í eftirlønargrunn, fellur burtur frá 1. mai 1987, og fáa limirnir í staðin útgoldið 0,9% av tí til eina og hvørja tíð galdandi løn.
5) § 3 í sáttmálunum verður orðað soleiðis:

lagtingslov om forlængelse af visse lønoverenskomster og aftaler m.v.

§ 1.

Overenskomster om løn- og arbejdsvilkår mellem Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og Arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður, der var gældende indtil 1. maj 1987, jfr. også lagtingslov nr. 24 af 17. maj 1987, forlænges til den 1. maj 1989 med følgende ændringer:

1) Fra den 1. maj 1987 forhøjes grundlønnen med 2,75 kr. i timen.
2) Fra den 1. maj 1988 forhøjes grundlønnen med 2,75 kr. i timen.
3) Forhøjelsen på 1% af den til enhver tid gældende løn ændres til 0,9%.
4) 1%, som efter overenskomsten fra 1985 mellem Føroya Arbeiðsgevarafelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag skulle i pensionsfond, falder bort fra den 1. maj 1987, og medlemmerne får i stedet udbetalt 0.9% af den til enhver tid gældende løn.
5) § 3 i overenskomsterne affattes således:
   a) For arbejde med stenknuser, for at passe motorer, kompressorer,

a) Fyri arbeiði við grótjótrara, fyri passan av motorum, kompressarum, spølum og líknandi í sambandi við byggiarbeiði, fyri passan av kranum, fyri koyring av traktorum, dumparum og líknandi anboðum, so sum vegtrumlum, hydrauliskum gravkúm, borivognum og betongbilum verður goldin eykaløn 7,20 kr./tíma.
b) Fyri at løða, spreingja og grótboran verður goldin eykaløn 9,20 kr./tíma.
c) Fyri tunnilarbeiði verður goldin eykaløn 8,70 kr./tíma.
d) Fyri at reinsa ketlar, vatntangar á skipi, oljutangar, lýsitangar og smeltitól og reinskan av kloakk og kjøli innan í skipi verður goldin eykaløn 9,50 kr./tíma.

a) For arbejde ved stenboremaskiner, for passen af motorer, kompressorer, pumper og lignende i forbindelse med byggearbejde, for passning af kraner, for kørsel med traktorer, dumpere og lignende, så som vejtromler, hydrauliske gravemaskiner, borevogne og betonvogne betales ekstraløn 7,20 kr./time.
b) For lade-, sprænge- og borearbejde betales ekstraløn 9,20 kr./time.
c) For tunnelarbejde betales ekstraløn 8,70 kr./time.
d) For rensning af kedler, vandtanke på skibe, olietanke, fiskeolietanke og rensning af kloak og køl indvendig i skibe betales ekstraløn 9,50 kr./time.

§ 2.

Framlongdu sáttmálarnir kunnu uppsigast av báðum pørtum við í minsta lagi 2 mánaða ávaring at fara úr gildi ein 1. mai, tó í fyrsta lagi 1. mai 1989.

§ 2.

De forlængede overenskomster kan opsiges af begge parter med mindst 2 måneders frist til at træde ud af kraft til en 1. maj, dog først den 1. maj 1989.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Uppskot

til

samtyktar

Um Føroya Løgting ger lóg um eftirlønarskipan fyri arbeiðsmarknaðin, áðrenn hetta valskeiðið er runnið, verða møgulig gjøld, ið verða áløgd pørtunum, í fyrsta lagi at virka frá 1. mai 1989.

Viðmerkingar:

Sáttmálarnir millum arbeiðsgevarar og arbeiðsmenn og arbeiðskvinnur vórðu sagdir at fara úr gildi 1. mai 1987.

Meðan sáttmálar eru gjørdir millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag, er sáttmálaloysi annars millum arbeiðsgevarar og arbeiðsmenn og arbeiðskvinnur.

Verkfallið hevur staðið við í tríggjar fullar vikur, og semingsstovnurin hevur endaliga og avgjørt boðað frá, at eingin samráðingarloysn fæst til vega.

Tí er bert í at velja uppílegging frá løgtinginum ella framhaldandi verkfall og verkbann, til annar parturin undir fíggjarligum trýsti liggur eftirá.

Hetta seinasta rakar stórar partar av samfelagnum og øðrum fakfeløgum, sum ikki kunnu medvirka til loysn av trætuni, t.d. skúlaverkið, heilsuverkið, fiski- og útróðrarmenn, aliviinnu og búnaðarvinnu, har milliónavirði fara fyri skeyti, umframt at framhaldandi ósemja elvir til enn størri vørutrot hjá almenninginum.

Serliga óheppið hevur tað verið, at heilsuverkið er komið at liggja ímillum, og vil landsstýrið framyvir royna at skipa so fyri, at hetta ikki hendir aftur.

Landsstýrið heldur tað tí vera neyðugt at leggja upp í ósemjuna nú, og hevur løgmaður tí heitt á løgtingsformannin um at kalla løgtingið inn til eykatingsetu.

Eftir tí sáttmála, sum er gjørdur í Tórshavn, hækkar lønin eitt 2 ára skeið frá 1. mai 1987 við umleið 8,8%.

Lógaruppskotið framleingir sáttmálarnar, arbeiðsgevarafelagið hevði við Føroya Arbeiðarafelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag og arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður, gevur feløgunum umleið somu hækking, sum arbeiðsmannafelagið í Havn hevur fingið, tó verður 1%, sum arbeiðsgevararnir rinda arbeiðsmannafelagnum í Havn í ein eftirlønargrunn, ikki goldið, men í staðin verður goldin løntakarunum 0,9% av lønini, soleiðis sum hon verður hækkað.

Í seinasta uppskoti semingsmansins var tikið við eitt protokollat um at seta eina felagsnevnd at gera uppskot til reglugerð um eina klokkuskipan. Hesin parturin er ikki tikin við í uppskoti landsstýrisins, men verður hann latin partunum at greiða.

Við 22-0 atkvøðum varð loyvi givið at frávíkja tíðarfreistini at viðgera hetta málið.

1. viðgerð 29. mai. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin varð vald soleiðis: Øssur av Steinum, Henrik Old, Tumnias Arabo, Ivan Johannesen, Jógvan Sundstein.

Á fundi sama dag kl. 06.30 legði formaðurin á arbeiðaramálanevndini fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 29. mai 1987 og við 1. viðgerð sama dag beint í arbeiðaramálanevndina.

Semingsmaðurin hevur verið á fundi í nevndini og greitt frá gongdini í semingsroyndunum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Øssur av Steinum, Thomas Arabo og Henrik Old) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) kann ikki taka undir við, at sama mistak, sum gjørt varð í 1985, aftur verður gjørt nú í 1987. Tað kann ikki roknast við, at sáttmálasamráðingar á arbeiðsmarknaðinum verða normalar aftur, fyrr enn tann mismunur er útjavnaður, sum gjørdur varð í 1985.

Fyri at bøta um hetta heldur minnilutin, at spurningurin um eftirlønargjaldið (0,9%) í øllum førum eigur at fara út til atkvøðugreiðslu hjá limunum í teim einstøku felagunum. Meirilutin í hvørjum felag sær avger sostatt, um uppheddin skal í grunn ella verður útgoldin sum eykalon.

Tantil atkvøðugreiðslan hevur verið, verður gjaldið inngoldið á bundna konto í peningastovni.

Minnilutin setir tí fram hetta

broytingaruppskot

til uppskot

landsstýrisins

Í § 1 verður skoytt uppí sum nýtt nr. 6:
»Tey í nr. 3) og 4) nevndu 0,9% verður arbeiðsgevarin at rinda inn á bundna konto í peningastovni, til limirnir í hvørjum einstøkum felag sær við skrivligari atkvøðu hava gjørt av, um peningurin skal rindast í eftirlønar grunn ella útgjaldast sum løn. Atkvøðugreiðslan skal fara fram í seinasta lagi 1.9.1987.«

I § 1 tilføjes som nyt nr. 6: »De i nr. 3) og 4) nævnte 0,9% skal af arbejdsgiveren indbetales på en spærret konto i et pengeinstitut, til medlemmerne i de enkelte foreninger ved skriftlig afstemning har afgjort, om beløbet skal indbetales i et pensionsfond eller udbetales som løn. Afstemningen skal foretages senest 1.9 1987.«

Minnilutin (Ivan Johannesen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Verandi arbeiðsstøðgur er fyrst og fremst orsakaður av tí mistaki, sum løgtingið gjørdi fyri 2 árum síðan.

Hetta førdi við sær, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum gingu út frá sum givið, at sama landsstýrið eina ferð enn fór at løggeva. Og hesum fingu teir rætt í.

Hetta førir sjálvandi við sær, at frælsi og ábyrgd hjá pørtunum í enn større mun kemur at minka.

Sambandsflokkurin mælti fyri 2 árum síðan í uppskoti til samtyktar, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir greiddu spurningin. Fingu teir loyvi til tað, høvdu vit onga arbeiðsóseinju í dag.

Sambandsflokkurin hevur framvegis somu støðu sum fyri 2 árum síðan og kann sum sagt ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Samstundis varð frá Adolf V. Hansen, løgtingsmanni, framlagt

broytingaruppskot

Uppskot

til

samtyktar

I

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at samráðingar verða tiknar upp við øll lock-outaðu fakfeløgini um sersáttmálar fyri tann partin av arbeiðsfólkinum, sum arbeiðir innan almenna sektorin (skúlaverkið, heilsuverkið, landsverkfrøðingin, barnagarðarnar v.m.) eins og innan øki landsstýrisins og kommunanna.

II

Álagt verður landsstýrinum at heita á semingsmannin um at taka upp samráðingar við lock-outaðu fakfeløgini og havbúnaðarfelagið um at gera sersáttmála fyri hesa annars viðbreknu vinnu.

2. viðgerð sama dag kl. 6.30. Broytingaruppskotini frá Adolf V. Hansen I og II fullu við ávikavist 1-0 og 2-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá Jógvani Sundstein til § 1 í lógaruppskotinum fall við 6-1 atkvøðum. § 1 í lógaruppskoti landsstýrisins varð samtykt við 17-1 atkvøðum, §§ 2 og 3 samtyktar við 17-0 atkvøðum. Við 17-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

Landsstýrisins uppskot til samtyktar varð samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð sama dag kl. 17.10. Lógin varð endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1300-1-6. Lóg nr. 67 frá 29. mai 1987

Fyrispurningar

Nr. 100-1 — 100-19

100-1 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi próstagarðinum á Nesi

Ár 1987, 12. september boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvani I. Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Á tí gamla søguliga kirkjustaðnum á Nesi standa tvey gomul hús, sum eru friðað sum forminnir, annað er kirkjan, og hitt er próstagarðurin.

Próstasetur varð sett á stovn í Føroyum á Nesi í 1557 við Heina Havreka sum fyrsta prósti, og har hevur próstasetur verið í øldir, próstagarðshúsini, sum nú standa har, eru bygd í 1864, meðan Hammershaimb var prógstur á Nesi. Hesi húsini vórðu bygd í eini tíð, tá prósturin hevði 20 merkur í jørð á Nesi, og tí var neyðugt, at húsini urðu framt tann tørv, sum próstafamiljan og próstaembætið høvdu brúk fyri av plássi, eisini kundu hýsa arbeiðskonum og húskøllum, sum arbeiddu á garðinum.

Tá talan herfyri var um at byggja tíðarhóskandi prestagarð á Nesi, varð havt á máli at taka gamla próstagarðin niður og byggja hendan á sama grund, hetta varð tó ikki gjørt, prestagarður er bygdur á øðrum stað, og gamli próstagarðurin varð friðaður og ogn landsstýrisins, men síðani tá er ikki rætt hond frá síðu fyri at røkja hesi hús, og vit vita øll, hvussu skjótt hús, sum standa ónýtt og ongan góðan hava, forfarast. Tann líkasæla og órøkisskapur, sum landsstýrið hevur sýnt, eru átalu verd, og verður einki gjørt í bræði, kann álvarsligt hóttafall koma á.

Peningur hevur verið avsettur á løgtingsins fíggjarlóg í fleiri ár til viðlíkahald, so hann skortar ikki.

Annað mál er so, hvat hesin søguligi kirkjustaður eigur at nýtast til framyvir. Onkur hevur havt upp á mál at nýta hann til eitt kirkjusavn, og tað er helst eitt gott hugskot.

Men so skal meiri peningur fáast til vega enn tað, sum játtað er á fíggjarlógunum til viðlíkahald.

Og tí leyvi eg mær at seta hendа spurning til landsstýrismannin Lassa Klein, sum umsitur hetta málsøki:

1. Hvørja ætlan hevur landsstýrið um viðlíkahald av próstagarðinum á Nesi.
2. Hvørja ætlan hevur landsstýrið um, at hann skal nýtast til í framtíðini.

4. februar svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørja ætlan hevur landsstýrið um viðlikahald av próstagarðinum á Nesi.
2. Hvørja ætlan hevur landsstýrið um, at hann skal nýtast til í framtíðini.

Til 1:
Síðani fíggjarárið 1984/85 hevur verið avsettur peningur á fíggjarløgtingslógunum undir konto § 15.15508, Bygdusøvn 323293. Í grunn til gomlu prestahúsini á Nesi ávikavist 100.000 kr., 37.500 kr. og 50.000 kr., og á fíggjarløgtingslógini 1987 eru somuleiðis avsettar 50.000 kr. Keypspeningurin fyri ognina var 100.000 kr., so at nú eru tøkar 137.500 kr. í grunninum.

Eftir áheitan frá landsstýrinum hevur landsantikvarurin 19. september 1986 sýnað prestagarðin á Nesi og gjørt eitt notat, hvørs niðurstøða er hon, at sum heild mugu húsini metast at vera í góðum standi, men at teimum tørvar rækt, og at vanlig rækt kann gerast, uttan at endalig støða er tikin til, hvat húsini skulu nýtast til, meðan ikki verður mælt til at gera størri umvælingararbeiði, so sum møgulig skifting av klædningi, bjálving og ístandseting innandura, fyrr enn støða er tikin til spurningin um nýtsluna av húsunum.

Landsstýrið hevur biðið landsantikvarin skipa fyri, at tey smærru umvælingararbeiðini oa. verða gjørd.

Tá endalig støða er tikin til, hvat húsini skulu nýtast til, fer landsstýrið at taka støðu til spurningin um tey størru umvælingararbeiðini.

Til 2:
Í frammanfyri umrøddu notati hjá landsantikvarinum verður um framtíðarnýtsluna av húsunum sagt soleiðis frá:
»Hugskot hava verið nevnd um
1. Fundar- og skeiðvirksemi. Ætlandi er tørvur á hølum til intensiv skeið og smærri fundir av ymsum slag, kanska íroknað prenstakonventir.
2. »Refugium« fyri listafólk, vísindamenn o.o.
3. Samkomuhøli í sambandi við kirkjuliga arbeiðið.
4. Kirkjusavn.

Møguliga kundu kombinatiónir av hesum hugskotum verið nýttar, eins og aðrir møguleikar óivað eru hugsandi; men neyðugt verður at taka spurningin upp til reella viðgerð.«

Landsstýrið hevur mett tað at vera beint, at bispur og Føroya Prestafelag fáa høvi at siga sína hugsan um hesi 4 hugskot, áðrenn endalig støða verður tikin til spurningin um nýtsluna av húsinum, og hevur sostatt sent teimum umrødda notat til ummælis viðvíkjandi nevndu hugskotum.

Tá landsstýrið hevur fingið frammanfyri umrøddu ummæli frá bispinum og prestafelagnum, fer landsstýrið at taka støðu til spurningin um framtíðarnýtsluna av prestagarðinum á Nesi.

100-2 Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av hølum til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoynni

Ár 1987, 23. september boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Eilif Samuelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvørja støðu hevur hetta landsstýri til bygging av hølum til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy?
2. Hevur landstýrið ætlanir um at biðja Landsskúlafyrisitingina útvega projekt til eina tílíka bygging?

Við løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 samtykti løgtingið at seta á stovn Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoynni.

Skúlin fekk fyribils innivist í gomlu skúlabygningunum við Gøtugjógv. Haraftrat vórðu í 1985 tikin í nýtslu eini nýbygd hús við nøkrum skúlastovum og matstovu.

Eyðvitað er, at skúlin hesa tíðina hevur havt alt annað enn góðar umstøður at virka undir, men við einum góðum vilja og góðum toli frá bæði næmingum og lærarum hevur skúlin so dánt verið førur fyri at røkja sína uppgávu.

Tað er eingin ivi um, at grundin til, at bæði næmingar og lærarar hava sýnt eina slíka langmóð, er vónin um »sælari tíðir«. Øll hava gingið við tí vissu í huganum, at hetta bert eru fyribils høli, og at ætlanin er, at skúlin skal fáa sínar egnu bygningar, formaður júst til skúlans nýtslu.

Hetta var eisini ætlanin hjá undanfarna landsstýri og hjá landsskúlafyrisitingini, sum í góðum samarbeiði framdu hetta mál, so langt sum tað nú er komið.

Tað hevur staðist nógv kjak um henda skúlan. Tað mesta kjakið kann sigast at hava verið tápuligt – ið hvussu so er fáfongt – tí tað hevur snúð seg um nakað so týdningarlítið, sum *hvar* ið skúlin skal vera.

At studentaskúli skuldi setast á stovn í Eysturoynni, vóru so at siga øll heilt samd um, og tað er tað, sum hevur størstan týdning. At ávísir flokkar og persónar lótu lokal áhugamál, ið bert gagnaðu teimum sjálvum, ganga fram um yvirordnað sjónarmið, sum fóru at tæna øllum samfelagnum best, tað mugu vit bara harmast um.

Nógv hevur verið talað um, at ein fiskivinnutjóð sum Føroyar eigur at hava eina fiskivinnuútbúgving. Einki átti at verið meiri natúrligt enn tað, men vit hava aftrað okkum, kanska mest orsakað uv, at ein slík útbúgving er kostnaðarmikil. Og við teimum útlitum, ið húmast fyri framman, nú vit kunnu fara at fáa eina blokkstudningsskipan eftir tí nýnstu, hetta landsstýrið hevur stungið út, so er uppaftur meira umráðandi, at vit fara at útnytta okkara tilfeingi, bæði tað fíggjarliga og tað menniskjaliga so væl, sum vit yvirhøvur kunnu.

Um nú og tá ið hægri handilsskúli verður bygdur í Eysturoynni, so hava vit í honum saman við studentaskúlanum so gott sum allar tær lærarakreftir, all tey fakhøli og allan tann útbúnað, ið neyðug eru fyri at gera eina fiskivinnuútbúgving til veruleika.

Men fyritreytin er, at alt smásinni og alt sjálvsøkni verður sett til viks til frama fyri heildina. Eftir eru so mest praktiskir spurningar um samskipan, og hesar spurningar er Landsskúlafyrisitingin væl før fyri at greiða saman við teimum avvarðandi áhugaðu pørtunum. M.a. út frá hesum sjónarmiðum verður spurt.

16. september varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin verður at svara.

17. december svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørja støðu hevur hetta landsstýrið til bygging av hølum til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy?
2. Hevur landsstýrið ætlanir um at biðja Landsskúlafyrisitingina útvega projekt til eina tílíka bygging?

Til 1:

Landsstýrið hevur á undirvísingarøkinum m.a. lagt stóran dent á, at verandi vinnuskúlar skulu virka væl og í mest møguligan mun verða lagdir út um landið.

Ein liður í hesum er, at tað nú verður farið undir at byggja 2. byggistig av tekniska skúlanum í Klaksvík og handilsskúla á Kambsdali.

Herumframt er ætlan landsstýrisins, at nýggi fiskaídnaðar- og havbúnaðarskúlin skal kunna byrja virksemi sítt í 1987 samsvarandi uppskoti til løgtingslóg, sum nú í heyst verð lagt fyri tingið, og við játtan, sum er sett á uppskotið til fíggjarløgtingslóg 1987.

Eisini er ætlan landsstýrisins, at nýggi sjóvinnuskúlin, sum játtan samuleiðis er sett av til á uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1987, skal byrja virksemi sítt í nevnda fíggjarári eftir reglum, sum landsskúlafyrisitingin í løtuni fyrireikar, og sum ætlanin er at leggja fyri tingið í hesi tingsetu.

Landsstýrinum er heilt greitt, at studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy sum eru hava ógvuliga trong kor at virka undir og skjótast gjørligt mugu fáa betri hølisviðurskifti.

Hin vegin ásannar landsstýrið, at fleiri av teimum næmingunum, sum higartil við avmarkaðum valmøguleikum hava valt at fara á studentaskúla ella HF-skeið, framyvir, tá valmøguleikarnir verða fleiri, í staðin fara at velja handilsskúla, fiskaídnaðar- og havbúnaðarskúla ella sjóvinnuskúla.

Støðutøka til spurningin um at byggja nýggjan bygning til studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy, møguliga á øðrum staði enn nú, kann sostatt ikki fara fram

einsamøll, men má vera samskipað við støðutøku til spurningin um, á hvønn hátt høli skulu útvegast til áðurnevndu verandi og komandi vinnuskúlar, miðnámsútbúgvingarnar, sum tær verða róptar í álitinum um hesar frá 1. oktober 1985.

Landsstýrið hevur í løtuni til umhugsanar spurningin um, hvar og á hvønn hátt høli skulu verða útvegað til fiskaídnaðar- og havbúnaðarskúlan og sjóvinnuskúlan.

Hesir skúlar hava tær almennu lærugreinirnar í felag við studentaskúlan og HF skeiðið og handilsskúlan og kunnu sostatt í stóran mun hava samstarv við hesar skúlar ella deildir av teimum um lærarar, fakhøli, samskipan, vallærugreinir, lestrarvegleiðing, yrkisvegleiðing o.a.

Landsstýrið fer sostatt ætlandi heilt skjótt at taka endaliga avgerð um, hvar og á hvønn hátt studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy framyvir skulu hava varandi innivist, sum ein liður í tí heildaravgerð, sum neyðug er at taka um innivist fyri teimum skúlum, sum skulu hýsa miðnámsútbúgvingunum.

Til 2:

Á uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1987 hevur landsstýrið sett 500.000 kr. av undir konto § 14.14953.313335 Studentaskúli í Hoydølum, í grunn í framhaldi av játtanum árini frammanundan.

Peningur hevur ikki higartil verið avsettur til at byggja studentaskúla og HF-skeið aðra staðni í landinum, men á uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1987 hevur landsstýrið eisini sett 500.000 kr. av undir konto § 14.14953.313343 Aðrir studenta- og HF-skúlar í grunn.

Í tí álitinum viðvíkjandi nevnda fíggjarløgtingslóguruppskoti, sum fíggjarnevndin nú leggur fyri tingið, er henda upphædd, 500.000 kr., hækkað við 1.500.000 kr. til 2.000.000 kr.

Um hesar játtanir verða samtyktar á fíggjarløgtingslógini 1987, er sostatt fíggjarligt grundarlag undir projektering av studentaskúlum og HF-skeiðum uttan fyri Havnina, heruppií í Eysturoy, og tá landsstýrið sum tilskilað í svarinum til spurning 1 hevur tikið avgerð um, hvar og á hvønn hátt studentaskúli og HF-skeið í Eysturoy skulu hava varandi innivist, fer landsstýrið at heita á landsskúlafyrisitingina um at seta hesa avgerð í verk.

100-3 Fyrispurningur til løgmans viðvíkjandi rikna fiskivinnupolitikkinum

Ár 1986, 19. september boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Paula Ellefsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvussu leingi ætlar Føroya Landsstýri at halda M/TR Háborg fastbundna at bryggju í staðin fyri at lata skipið fiska svartkjaft?
2. Hevur sitandi landsstýri nakrar ætlanir, sum føra við sær, at aftur verður rikin ein nøkulunda skilagóður fiskivinnupolitikkur í Føroyum, av illum eftir teimum rætningslinjum, sum sitandi samgonga setti sær fyri?

Viðmerkingar:

Tað var tað javnaðarlandsstýri, sum legði frá sær í 1980, sum av álvara byrjaði royndirnar at framleiða svartkjaft til matna umborð í skipi.

Táverandi landsstýri gav innflutningsloyvi til verksmiðjutrolaran Giljanes.

Undanfarna landsstýri undir sambandsleiðslu helt fram við svartkjaftaroyndunum og viðkaði hesar bæði á sjógvi og landi, m.a. við at tryggja framhaldandi rakstur av trolaranum, líka íntil Javnaðarflokkurin aftur fekk landsins leiðslu um hendi við ársbyrjan 1985.

Undir hørðum trýsti frá flest øllum flokkum, serliga frá Javnaðarflokkinum í andstøðu eftir at fáa bygt risastór svartkjaftavirki í Kollafirði og í Gøtu og eftir at fáa fleiri verksmiðjutrolarar til landið gav undanfarna landsstýri innflutningsloyvi til M/TR Reynsatind, nú M/TR Olaf í Garðastovu. Raksturin av Reynsatindi bleiv eisini tryggjaður undanfarna valskeið út.

Við ársenda 1984 høvdu vit føroyingar gjørt sera nógvar royndir á hesum øki, og høvdu vit heima á landi eina vitan um svartkjaftaveiðu, sum einki annað samfelag hevði.

Givið er, at hesar royndir hava kostað privatmonnum nógvan pening og eisini tí almenna, sum roknað varð við.

Men vitan, sum ikki verður nýtt, er ikki til nakra nyttu.

Sitandi landsstýri hevur valt at lata fyrst Reynsatind og nú eisini Giljanes fara á húsagang.

Samstundis hevur sitandi landsstýri skundað undir íløgur í risastórar verksmiðjutrolarar til veiðu og viðgerð av svartkjafti. Tann fyrsti, M/TR Andrias í Hvannasundi, er komin fyri mánaðum síðan, hevur verið úti og roynt, dugdi ikki til endamálið og er nú til umbyggingar.

Tann næsti, M/TR Háborg, er eisini komin, men liggur bundin við bryggju skjótt út á sættu viku.

Tann fyrri liggur; tí tað tíverri vísir seg at vera fundamental brek við skipinum.

brek sum ein og hvør fiskivinnumálaráðharri eins og aðrir, sum skuldu verið kønir innan fiskiveiðu, áttu at luvt sað, áðrenn skipið bleiv bygt.

Tann seinri liggur, tí landsstýrið ikki vil geva honum fiskiloyvi til at veiða svartkjaft, av øllum fiskastovnum.

Triði stóri svartkjaftatrolarin kemur væntandi skjótt. Og enn vita vit ikki, um hesin eisini kemur at liggja, ella um skipið kemur út at fiska.

Orsøkin til, at Føroya Landsstýri heldur M/TR Háborg bundna við bryggju, er, at tað ikki vísir seg gjørligt at selja M/S Krúnborg uppá rimiligar treytir.

Víst verður á, at Sambandsflokkurin sum einasti flokkur í figgjarnevndini gekk ímóti at krevja ein nótabát útfluttan í staðin fyri M/TR Háborg. Nýggja skipið skuldi jú veiða svartkjaft, har talan ikki er um avmarking í kvotum.

Víst verður eisini og serliga á, at tann setningur, sum sitandi landsstýri setti sær, nevniliga at fiskiveiðuorkan ikki skuldi økjast, tá talan er um veiðu á fiskigrunninum, er vorðin heilt fyri ongum.

Pástandurin um, at ein fyri at fáa nýtt skip í staðin skuldi útflyta annað skip, hevur víst seg ikki at hava hald í veruleikanum eins og meginparturin av tí, sum sitandi landsstýri hevur ført fram.

Fyri okkum øðrum sær tað út til, at sitandi landsstýri yvirhøvur ikki hevur verið ført fyri at reka nakran fiskivinnupolitikk, serliga ikki tá talan er um at regulera veiðuorkuna eftir botnfiski. Og tað er júst her, trupulleikarnir fyrst og fremst liggja.

Meðan landsstýrið so ruddiliga hevur mist tamarhaldið á tí økinum, so sær út til, at sitandi samgonga í staðin fyri hevur bitið seg fasta í eitt skip hjá einum ávísum reiðarfi, enntá einum reiðarfi, sum eftir øllum at døma kann reka svartkjaftaveiðu, sum ikki kostar landskassanum nakað.

Tað fyrikemur flestu av okkum øðrum heilt burturvið, at ivaleyst mest framkomna svartkjaftaskipið, kanska í øllum heiminum, skal liggja fastbundið við bryggju í staðin fyri at veiða svartkjaft orsakað av skilaleysum fiskivinnupolitikki, ríkin í Føroyum.

Út frá hesum loyvir undirritaði sær at stilla løgmanni og fiskimálaráðharra, Atla Dam, hesar spurningar:

17. september varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

14. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

Svar

Spurt verður, hvussu leingi landsstýrið ætlar at lata m/tr Háborg liggja við bryggju, og má tað metast »óaktuelt« at svara hesum burtursæð frá at viðmerkja, at landsstýrið hevur ikki havt hetta skip liggjandi við bryggju.

Annar spurningurin snýr seg, um sitandi landsstýrið hevur ætlan at reka ein nøkulmda skilagóðan fiskivinnupolitikk, og er sjálvsagt, at so er.

Viðmerkingarnar eru so óseriøsar og lítið í samsvari við veruleikan, at spurningurin illa hevur uppiborið svar, og bert tað, at sagt verður, at sitandi landsstýrið hevur valt at lata fyrst »Reynsatind« og síðan »Giljanes« fara á húsagang, lýsir viðmerkingarnar. Til hetta er bert at siga, at tað væl eisini eru eigararnir, sum tikið hava hesa avgerð, tá figgjarliga orka teirra ikki rakk til at reka skipini víðari.

100-4 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi útbýting av avlopi hjá Dansk Tipstjeneste í Føroyum

Ár 1986, 25. november setti Óli Breckmann, løgtingsmaður, fram niðanfyri nevnda fyrispurning, sum var soljóðandi:

Hevur landsstýrið umhugsað at seta bannið móti útluting av avlopinum hjá Dansk Tipstjeneste úr gildi?

Viðmerkingar:
Tá P/f Ítróttarvedding við løgtingslóg nr. 50 frá 1983 fór undir at virka frá ólavsøku í 1984, varð bannað øðrum ítróttarveddingum í Føroyum at virka.

Dansk Tipstjeneste gevst frá ársloki 1985 at útluta part av avlopi sínum til vælgerandi endamál í Føroyum. Sostatt datt burtur ein inntøkukelda hjá fleiri ungdóms-, ítróttar- og øðrum felagum, sum P/f Ítróttarvedding ikki kundi veita viðurlag fyri.

Síðan er tað hent, at Ítróttarvedding er dottin niðurfyri av tvørrandi undirtøku og áhuga frá almenningsins síðu, soleiðis at føroyskur ítróttur hevur mist í bæði borð.

Sum fólkatingslimur hevur undirritaði fingið áheitan frá m.a. ÍSF um at heita á donsku stjórnina at biðja um hennara tilmæli til, at Dansk Tipstjeneste aftur kann fara undir at útluta part av avlopinum í Føroyum. Tipstænastan hevur fingið somu áheitan til tess at fáa hennara tilsøgn um at taka uppaftur hendu sið ti hann kom so mongum føroyskum tiltøkum og felagsskapum væl við.

Í svarbrævi tann 18. august í ár sendir stjórin fyri Tipstænastuni, Frank Howitz, mentamálaráðnum sítt tilmæli um, at tænastan er sinnað til aftur at fevna um Føroyar.

Forsætisráðharrin svarar somuleiðis í bræv 4. september, at hann einki hevur ímóti, at Føroyar aftur fáa lut í avlopinum, men at hetta kann bert fáast aftur í lag, um løgtingslógin um Pálf Átróttarvedding verður sett úr gildi.

Føroyingar vedda í donsku Tipstænastuni fyri einar 10-15.000 kr. hvørja viku, og í 1984 vórðu úthlutaðar 355.000 kr. til endamál í Føroyum.

Nú komandi oyggjaleikir eru ásettir at verða í Føroyum í 1989, standa stórar íløgur fyri durum, og tá koma allar inntøkur væl við.

Eftirsum uppafturtøka av hesi úthýtingarskipan í Foroyum er ynski hjá ÍSF og mongum øðrum felagum, loyvir undirritaði at spyrja landsstýrismannin, um landsstýrið hevur umhugsa at avsiga lóg nr. 50 frá 1983.

Fyrispurningurin varð ikki svaraður.

100-5 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ætlanum landsstýrisins í millumlanda flúgving

Ár 1986, 10. december setti Svend Aage Ellefsen, løgtingsmaður, fram niðanfyri nevnda fyrispurning, sum var soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið viðvíkjandi føroyskari luttøku í millumlanda flúgving?
2. Nær verða hesar ætlanir settar í verk?

Viðmerkingar:

Gjøgnum seinasta valskeið hevði Páll Vang, landsstýrismaður, samráðingar við donsku ríkismyndugleikarnar og avvarðandi stovnar um føroyska luttøku í millumlandaflúgvingini.

Eftir landsstýrisskifti hildu hesar samráðingar fram, og Lasse Klein, landsstýrismaður, boðaði fyri meira enn einum ári síðani frá, at einki sýntist at vera til hindurs fyri, at føroyingar heilt ella partvist tóku yvir flúgvingina millum Føroyar og København.

Sum kunnugt gekk einkarrætturin hjá Danair (SAS) út á heysti 1985. Flogrutan millum Føroyar og Danmark man vera ein tann best lønandi í heiminum, og tað tí

tykjast sjálvsagt, at føroyingar í mest møguligan mun reka hana sjálvir, so ágóðin fellur har, hann skal · · nevniliga føroyska samfelagnum tilgóðar.

Flestu ferðandi munnu vera samd um, at Danair ikki í nóg góðan mun hevur bøtt um tænastustøðið á rutuni, nú teir hava havt hana í hondum so leingi.

Talið av fráferðum hevði fyri tað fyrsta verið nógv størri, helst tvey flogfør til og úr Keypmannahavn dagliga, eins og tað átti at verið flogið til Skotlands/Onglands og Noregs.

Regluligur farmaflutningur loftvegis í størri mun átti eisini fyri langt síðani at verið fyriskipaður.

Alt í alt er niðurstøðan, at menningin av rutuni ikki gongur nóg skjótt, so leingi vit føroyingar ikki sjálvir eru uppií.

Sum nevnt omanfyri er lougu langt síðani, at sagt varð, at okkum stóðst í boði at koma uppí, tó uttan at tað enn fyriliggur nakað ítøkiligt frá landsstýrisins síðu í so máta.

Vit løgdu frá Fólkaflokkinum uppskot fyri løgtingið í seinastu tingsetu til loysn av málinum, men uppskotið varð felt.

Undirritaði heldur ikki, at tíðin bara skal ganga, uttan at framstig verða gjørd, og loyvi eg mær tí at seta landsstýrismanninum soljóðandi fyrispurning.

17. december svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið viðvíkjandi føroyskari luttøku í millumlanda flúgving?
2. Nær verða hesar ætlanir settar í verk?

Viðmerkingar:

Í sambandi við, at Føroyar tann 1. oktober 1985 fingu rætt til at flúgva millum Føroyar og Danmark, hevur verið arbeitt við ymiskum møguleikum fyri at fáa flúgving í lag.

Tað hevur víst seg at vera ógvuliga torført at byrja nakra flúgving uttan stórar kapitalíløgur. Ein enn størri meinbogi er tó, at okkum føroyingum vantar manning at kalla øll øki innan loftferðslu. Útbúgving av tílíkari manning fer at taka ár og er hartil sera kostnaðarmikil.

Undirritaði metir, at funnið er fram til ein sera lagaligan máta at fáa í lag loftferðslu í føroyskum karmi.

Ein arbeiðsbólkur hevur gjørt fyribils avtalu við eitt útlendskt flogfelag um at stovna eitt føroyskt flogfelag at røkja loftferðslu frá og til Føroya. Tilskilast skal, at bindandi avtalur eru treytaðar av góðkenning landsstýrisins.

Orsøkin til, at ikki meira verður upplýst um felagið, sum fyribilsavtala er gjørd við, er tann, at landsstýrið enn ikki hevur viðgjørt málið, men so mikið kann leggjast aftrat, at talan er um eitt altjóða flogfelag, sum eigur og rekur fleiri flogfør.

Um skjalatilfarið, sum avtala er gjørd um, skal í høvuðsheitum sigast:

Av uppskotunum til stovningarsamtykt og viðtøkur sæst, at felagið verður stovnað við einum partapeningi upp á 1 mió. kr.

Landsstýrið og/ella føroyskt felag hevur 51% av partapeninginum, meðan útlendska felagið hevur 49% av partapeninginum.

Ásannandi at vit eru ikki enn mentir at reka flogferðslu einsamallir, er gjørdur ein 5 ára partseigarasáttmáli og útbúgvingaravtala við útlenska flogfelagið um ávís viðurskifti.

Í sáttmálunum er m.a. ásett, at felagið skal flúgva eftir føroyskari konsessión, sum landsstýrið góðkennir.

Viðvíkjandi rakstrinum er ásett sum fyribilsskipan, at útlendska flogfelagið útvegar neyðug flogfør og — sum eitt tað týdningarmesta — at útlendska flogfelagið einsamalt ábyrgist fyri møguligum rakstrarhalli.

Viðvíkjandi starvsfólki er ásett, at útlendska flogfelagið bindur seg til at útbúgva umleið 20 fólk, talan er um flogskiparar, mekanikarar, flogtermar, fyrisiting og onnur neyðug starvsfólk í einum vælvirkandi flogfelag. Felagið skal rinda allar útreiðslur til útbúgvingarnar.

Í kalkulatiónsskjali er sett upp niðurmiliga fíggjarlig rakstrarætlan, og í ferðaætlanini er ásett, at ferðslan skal ganga út frá Føroyum. Ætlanin er at flúgva tvær túrar um dagin.

Tey skjøl, sum landsstýrið skal taka støðu til, eru hesi:

1) suvningarsamtykt,
2) viðtøkur,
3) partaeigarasáttmáli,
4) útbúgvingaravtala,
5) kalkulatiónir,
6) ferðaætlan.

Treytað av, at landsstýrið góðtekur hesa ætlan í bræði, kann byrjast at flúgva við føroyskum flogfari millum Vágar og Keypmannahavn á sumri 1987.

100-6 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi bergholi til Gásadals

Ár 1987, týsdagin 3. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Svond Aage Ellefsen og Ivan Johannesen, løgtingsmonnum, sum var soljóðandi:

Nær verður farið undir bergholið til Gásadals?

Viðmerkingar:

Ferð eftir ferð verður í fjølmiðlunum boðað frá, at farast skal undir bergholini Signabø/Kaldbakshotn og Lopra/Sumba.

Nú seinast frættist, at nýggj boriútgerð er komin til landið, so at ætlaða Sumbiarbergholið verður tvisporað.

Vit hava frá Fólkaflokkinum mangan víst á tað høpisleysa í at gera eitt einkultsporað berghol til Sumbiar og gleðast tí yvir, at atfinningar okkara eru tiknar til eftirtektar, og hóskandi loysn er funnin.

Men hvussu verður hinvegin við Gásadalsbergholinum.

Mær kunnugt hevur fullfiggjað boriútgerð staðið meira enn eitt ár á landsfjósinum í Kollafirði, og eftir at tað nú er gjøgnumborað á Kunoynni, standa sostatt tvey sett av boritólum ónýtt í landinum.

Kortini frættist einki um, nær byrjað verður at bora til Gásadals.

Nógv verður mann og mann ímillum tosað um ov stórt íløguvirksemi kring landið; men í Vágum hevur ikki í mannaminni verið so vánaligt sum hesi bæði seinastu árini. Varð tað ikki fyri peningin, sum danski staturin leggur í at útbyggja á flogvøllinum, so lá alt at kalla steindeytt í so máta.

Her má broyting koma í sum skjótast. Sitandi samgongan kann ikki framhaldandi loyva sær at revsa oyggina, tí flokkarnir, ið vardu av heuni, ikki fáa løgtingsumboð valt har vesturi.

Náttúrliga átti Gásadalsbergholið at verið tað fyrsta, sum farið varð undir í hesum valskeiðnum — klárt sum tað var at bora, men higartil er so skeiðið hálvrunnið, uttan at nakað røkist fyri, at gongd kemur á.

Víst skal verða á, at vágafólk bera sín part av byrðini av landshúsarhaldinum og áttu tí at átt samsvarandi rættindi.

Í fyrsta umfari loyvi eg mær her at átala tað harðrendu framferð, samgongan sýnir móti Vágoynni, og í øðrum lagi loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum í samferðslumálum soljóðandi fyrispurning.

26. mars svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Í 1980 var komið so mikið væl áleiðis við ætlanunum um tunnil til Gásadals, at tað var nærum klárt at fara til verka.

Síðani eru aðrir tunlar — av skiftandi samgongum — tiknir fram um hendan, men nú stendur so Gásadalstunnilin aftur fyrstur í røðini av tunnilarbeiðum.

Sambært teirri ætlan, landsstýrið hevur lagt viðvíkjandi tunlagerðum, verður farið undir tunnil til Gásadals á vári 1988.

100-7 Fyrispurningur til løgmann viðvíkjandi reglunum um tænastumannaviðurskifti landsstýrismanna

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ivan Johannesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær ætlar løgmaður aftur at halda lógina um stýrisskipan Føroya?

Viðmerkingar:

Stýrisskipan Føroya inniheldur greiðar reglur um møguleikarnar hjá landsstýrismonnum at hava onnur støv við siðuna av.

Lógarreglurnar siga m.a.:

Hevur landsstýrismaður, tá ið hann tekur við, støv í almennari tænastu ella privatum virkjum, samtøkum ella stovnum, skal hann vanliga siga tey frá sær.

Tó kann hann í hendinga førum við fyribils samtykki løgmans halda tílíkum støvum, um løgmaður heldur, at tey ikki kunnu hava við sær trupulleikar í røkjanini av embætisskyldu hansara sum landsstýrismaður ella á hansara viðurskiftum áraka teimum ymsu rakstrartættunum. Løgmaður skal, um so er, alt fyri eitt skrivliga senda fíggjarnevnd løgtingsins boð um hetta. Fíggjarnevndin kann innan fyri 14 dagar aftan á móttøkuna sýta avvarðandi landsstýrismanni at halda tílíkum støvum. Aftan á útlopið av hesum tíðarskeiði sigur løgmaður løgtingsformanninum frá, hvørji støv avvarðandi landsstýrismaður framvegis hevur loyvi at røkja.

Landsstýrismaðurin Jógvan Durhuus situr framvegis sum nevndarlimur í Tryggingarsambandi Føroya, enntá sum næstformaður.

Støvini sum landsstýrismaður og næstformaður fyri tryggingarsambandið eru fyri tað fyrsta ikki forenilig.

Fyri tað næsta er talan um álvarslig formligt brot á lógina um Stýrisskipan Føroya.

Út frá hesum viðmerkingum loyvir undirritaði sær at stilla løgmanni henda spurning.

4. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

14. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Spurningurin ljóðar:

Nær ætlar løgmaður aftur at halda lógina um stýrisskipan Føroya?

Og svarið er, at tað ætlar hann at gera til eina og hvørja tíð.

Málið, sum sipað verður til, er, at Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, framhaldandi hevur havt sæti sum nevndarlimur í Tryggingarsambandinum Føroyar, uttan at løgmaður hevur boðað fíggjarnevndini frá hesum.

Her er hent eitt mistak, soleiðis at nevnda mál er útigloymt, tá hesi viðurskifti vórðu umrødd í landsstýrinum eftir skipanina, hóast Jógvan Durhuus tá setti fram ynski um at varðveita henda sess.

Feilurin er nú rættaður, og havi eg skrivað fíggjarnevndini um málið og greitt frá, at eg út frá fyriliggjandi fordømum havi góðtikið hetta eykastarv Jógvan Durhuusar.

100-8 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi elevatori umborð á Dúgvuni

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevndu fyrispurningi frá Jógvani I. Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nú er nakað síðani, at »Dúgvan« kom at røkja siglingina millum Skálafjørðin og Havnina, og sigast kann, at hon hevur riggað rættiliga væl í hesi sigling, men treyðugt so at tað ikki er okkurt, sum kundi verið betri. Eitt av hesum eru umstøðurnar hjá fólki, sum av einari ella aðrari orsøk eru veik til gongu, og fólki, sum situr í rullistóli, at koma upp í ferðafólkarúmini, og tí er harðliga tiltrongt, at elevatorur verður ísettur, fyri at slík fólk lagaliga kunnu koma upp og niður.

Eg vildi mett, at hetta kann gerast, meðan skipið er í sigling. Tað hevur áður verið frammi, at hetta skal gerast, men enn sæst einki til, at tað verður gjørt.

Tí loyvi eg mær at spyrja:

1. Verður elevatorur settur í »Dúgvuna«?
2. Um svarið er ja, nær verður hetta so gjørt?

4. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

26. mars svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Spurningarnir:

1. Verður elevatorur settur í »Dúgvuna«?
2. Um svarið er ja, nær verður hetta so gjørt?

Sjálvandi skal lyfta setast í »Dúgvuna«, tað er eingin ivi um tað, eins og arbeitt verður við spurninginum at fáa sett lyftur umborð á onnur strandferðsluskip, sum hava lyftu fyri neyðini.

Spurningurin um at fáa sett lyftu umborð á »Dúgvuna« hevur verið viðgjørdur, síðani »Dúgvan« kom til Føroya. Í dag er spurningurin komin so mikið langt, at landsstýrið skal taka støðu til spurningin, og hevur Strandfaraskip Landsins biðið um heimild at keypa og installera eina lyftu umborð á »Dúgvuna«, fyri at ferðafólk kunnu koma frá bildekkinum upp á kafeteriadekkið.

Leveringstíðin uppá eina lyftu er seks mánaðir.

Íløgan fyri eina vanliga lyftu er uppá umleið kr. 500.000,00 til kr. 700.000,00. Fyri eina størri lyftu, sum eisini kann taka eina sjúkrabøru, er kostnaðurin nakað hægri, við umvælingum og krøvum frá klassa og skipasýni verður mett, at ein tílík lyfta kostar umleið 1 milj. krónur.

100-9 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi flogvallamálinum

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvani I. Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Í seinastuni hevur aftur verið eitt ávíst orðaskifti um flogvallamálið.

Eg havi fyrr altíð gingið út frá, at flogvallamálið var eitt lands- og rikismál, men gongdin í seinastuni bendir á, at hetta nú er vorðið meira til eitt kommunalt mál, við tað at Kirkjubøar og Tórshavnar kommuna arbeiða við eini ætlan um at gera flogvøll á Glyvursnesi, og kommununnar í Vágum arbeiða fyri eini ætlan um at útbyggja flogvøllin vesturi í Vágum.

Í síni tíð, tá kanningar vórðu gjørdar, hvar best var at gera ein landsflogvøll í Føroyum, varð víst á stað bæði á Sandoynni og á Eysturoynni, har tað var stóran mun betri, bligari og tryggari at gera flogvøll enn bæði á Glyvursnesi og vesturí í Vágum, men hetta sýnist at vera skúgvað til viks.

Og tí hevur tað áhuga at fáa at vita, eftir hvørjum rætningslinjum landsstýrið nú arbeiðir í hesum máli.

Um tað er so, at flogvøllur bert kemur upp á tal, har kommuna ella kommunur koma við umsókn um landsflogvøl, kanska meir av lokaláhugamálum enn landsáhugamálum, tí lystir meg at frætta:

Eftir hvørjum rætningslinjum tekur landsstýrið støðu til, hvussu framtíðar flogvallamálið skal loysast?

4. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

7. apríl svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Hvørki løgting, landsstýri ella aðrir myndugleikar kunnu nokta kommunum at taka spurningar upp til viðgerð, sum tær annars meta seg at hava rætt til innan fyri tey ábyrgdarøki, sum teimum eru tillutað í lógum landsins.

Men tað er eingin ivi um, at tá ið spurningar um flogvallaviðurskiftini í Føroyum hava tikið seg upp, so hevur tað verið landsstýrið og rikismyndugleikarnir, sum hava samráðst í felag.

Eingin støða er tikin til at leggja flogvøllin aðrastaðni enn í Vágunum. Flogvøllurin har er longdur, og nógvur peningur er og verður lagdur niður har at

modernisera og víðka um hús o.a., so rúmligari og hentari verður hjá øllum, ið á onkran hátt brúka hann.

Eingin avtala er gjørd millum landsstýrið og tær báðar kommunurnar í Suðurstreymoy um flogvøll á Glyvursnesi, mær vitandi heldur eingin endalig avtala millum umtalaðu kommunur.

So leingi eingin onnur samtykt fyriliggur um nýggjan flogvøll, so er bert talan um tann eina flogvøllin, nevniliga tann í Vágunum.

Landsstýrið hevur ongantíð givið kommunum hvør sær ella í felag saman við øðrum kommunum loyvi at arbeiða við spurninginum um nýggjan alternativan flogvøll.

Sum tað skilst, so er tað Tórshavnar kommuna, sum einsamøll arbeiðir við spurninginum og skal halda fram við hesum, so má tulkingin vera tann, at allar kommunur í landinum kunnu gera tað sama, og svarið má tá verða út frá einum fíggjarligum sjónarmiði, at tað kunnu tær ikki.

Fær ein kommuna myndugleikagóðkenning, so kann ein hugsa sær til, at so fáa allar sama møguleika, og tað ber ikki til.

Eingin støða er tikin til at broyta verandi praksis.

Kanningarnar, sum gjørdar hava verið av flogvølli aðrastaðni enn í Vágunum, eru framvegis til skjals, og skal spurningurin um annan flogvøll enn hann í Vágunum viðgerast, so er tað rímiligt og rætt, at hesar kanningar verða endurskoðaðar, og at landsstýri og løgting taka støðu til, í hvønn mun hetta skal gerast.

Frá Ministeriet for Offentlige Arbejder hevur landsstýrið fingið tilfar sendandi, sum býráðsformaðurin í Tórshavn hevur handað fyrrverandi samferðsluráðharranum Arue Melchior, ið er dagfest 29. mai 1986, og somuleiðis »Foreløbig notat om lufthavn ved Tórshavn«, sum er gjørd av Anders Nyvig A/S tann 3. februar 1986 og, sum tað skilst, umbiðin av býráðsformanninum í Tórshavn í januar 1986.

Av tí at notatið er stemplað »fortroligt«, her ikki til at endurgeva nakað av tí tilfarinum enn.

Men kortini kann sigast so mikið, at tilfarið bendir á, at lokaláhugamálini ganga fram um landsáhugamálini, og er orsøkin helst tann, at trupult er at fáa eina objektiva metingg, tá kanningin verður gjørd út frá slíkum arbeiðssetningi, har kommunur sjálvar standa fyri kanningunum.

Spurningurin um flogvallaviðurskiftini í Føroyum er til viðgerðar í samferðslunevnd Føroya Løgtings.

Annars kann verða upplýst, at Tórshavnar kommuna hevur biðið landsstýrið um fund um teirra uppskot um flogvøll á Glyvursnesi. Kommunurnar í Vágum hava havt fund við landsstýrið um teirra ynski um at leingja flogvøllin í Vágunum, og ynskja aðrar kommunur at siga sína hugsan um flogvallamálið, eru tær vælkomnar til tað.

100-10 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi gerð av vegnum millum Funning og Funningsfjørð

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvan I. Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Í fylgiskjølunum til fíggjarlógina sæst, at 2 mió. kr. eru játtaðar til gerð av vegnum millum Funning og Funningsfjørð. Hesin vegur hevur nú verið í gerð í mong ár, og av teimum 7 km, sum hann er til longdar tilsamans, er minni enn ½ km eftir at spreingja og planera norð til Funnings, og eg meti, at hesar 2 mió. kr. røkka til hetta arbeiðið.

Men sjálvt um vegurin kemur igjøgnum í ár, so vantar nógv í at gera hann forsvarligan til at loyva almennari ferðslu á. Eg meti, at asfaltera er bert umleið ein stívur triðingur, og honur tørvar áskot í støðum, stokkaverju nógvastaðir móti sjósíðuni og rekkverk á brúgvarnar.

Nú haldi eg, at tað er tíð uppá at gera henda vegin lidnan sum skjótast, so vit kunnu gera nýtslu av teimum íløgum, sum har eru niðurlagdar.

Landsverkfrøðingurin metti í 1980, at hesin vegurin skuldi verða liðugur longu í 1982, og nú skriva vit 1987.

Um nú játtanin upp á 2 mió. kr. fyrst og fremst verður nýtt til at koyra vegin igjøgnum fyri, eru so møguleikar fyri at fáa fígging til liðuggerð av vegnum í hesum fíggjarárinum, t.d. av tí peningi, sum er avsettur til vegastokkar, asfaltering, vanligt hald og størri ábøtur á vegir, sum samanlagt standa við 27,5 mió. kr. á Løgtingsins fíggjarlóg, ella onkra aðra loysn, so at hesin vegur kann verða liðugtgjørdur í ár.

Tí loyvi eg mær at seta fram henda fyrispurning:

Verður Funningsvegurin gjørdur liðugur til almenna ferðslu í hesum fíggjarári?

4. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

31. mars svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Farið varð undir hesa vegagerð á sumri 1978, og hevur verið arbeitt á hvørjum ári frá mai/juni mánaði til nov./dec., tó undantikið 1980, tá eingin játtan var til hetta arbeiðið.

Tað fyrsta árið, 1978, vórðu grovplaneraðir o.u. 1300 m við tilfari, sum lá eftir frá Sundatunlinum, annað árið, 1979, varð brúgv gjørd um Fjarðaá og grovplaneraðir einir 700 m longri fram, eisini við tilfari frá Sundatunlinum.

Triðja árið, 1980, var, sum longu sagt, eingin játtan og tí bert smávegis gjørt við hamping, og tann fyrsti hagin, komið varð ígjøgnum, fekk rætt við seyðahúsi sum endurgjald fyri lendi og miss av rætt o.ø.

Í 1981 varð sett á at taka grót frammi við Blæðingsgjógv og vegurin grovplaneraður haðani og fram til Ljóságjógv, o.u. 1300 m.

Fimta árið, 1982, vórðu brúgvar gjørdar um Ljóságjógv og Skarðsá og annars tvørrennur lagdar á tí vegastrekkinum, sum varð gjørt frammanundan.

Í 1983 varð strekkið millum Ljóságjógv og Hagagjógv, o. u. 1300 m, grovplanerað.

Sjeynda árið, 1984, varð brúgv gjørd um Hagagjógv og grivið einar 500 m longri fram.

Áttanda árið, 1985, vóru teir tveir fyrstu km gjørdir lidnir og asfalteraðir, og farið varð undir at gera brúgv um Titlá, og byrjað varð at bora fraumi við Stevgjógv, og eisini varð rætt við seyðahúsi gjørd í tí næsta haganum, Sáttarenni, sum endurgjald fyri lendi og miss av seyðahúsum.

Níggjunda árið, 1986, varð brúgv gjørd um Mjóstígsá, og einir 2 km vórðu asfalteraðir — nakað fram um Ljóságjógv — og annars varð arbeitt við at grovplaneva vegin frá Stevgjógv og fram ímóti svinginum í Funningi.

Upplýsast kann, at tann samlaði bókaði kostnaðurin fyri hetta arbeiðið frá 1978 og fram til 1986 er 15,4 milj. kr.

Í ár eru tíggju ár, síðani Funningsvegurin byrjaði, og nú er komið so mikið áleiðis, at vegurin verður komin ígjøgnum í hesum árinum.

Kortini verður væl av arbeiði eftir at gera tey komandi árini við hamping, asfaltering og trygging av vegnum.

Her hja okkum hevur altíð verið vanligt at taka vegirnar í nýtslu, so skjótt sum fram er komandi, og hava tey ferðandi dugað væl at víst skynsemi og tolni, meðan arbeitt hevur verið við at fáa tað seinasta frá handini.

Vegurin verður við tí upphædd, sum er sett av á fíggjarlógini, nóg mikið liðugur, til at koyrandi verður ígjøgnum í ár.

Hjálagt kort av vegastrekkinum.


BOTNAHAGI
Funding
(Funningur)
Í RÚSL
SATTAHEÑA
HJALLABRÚ
FERÖERNE 1:20 000
ALARAGI
ENNI HAGA

100-11 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi tolllækking upp á eykaútgerð til bilar

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Johannes Martini Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Kann fíggjarmálaráðharrin vátta, at ein verulig tolllækking frá 46% til 28% upp á eykalutir til bilar er farin fram?
2. Um so er, hvussu kann tað so bera til, at almenningurin lítið og einki hevur merkt til hesa tolllækking?
3. Kann ráðharrin í fíggjarmálum syrgja fyri, at hesi viðurskifti verða kannað og fingin í rættlag skjótast møguligt.

Viðmerkingar:
Í løgtingsmáli nr. 11/1986: Broyting í innflutningsgjøldum vórðu m.a. eykalutir o.a. til akfør lækkað úr 46% niður í 28% í tollavgjaldi, og má hetta sigast at vera ein munandi lækking, sum átti at komið týðiliga fram, tá neyðugt er at ogna sær eykalutir, ella t.d. við keyp av nýggjum dekkum o.ø.

Nú er veruleikin tann, at omanfyri nevnda tolllækking á eykalutum til bilar er torfør, fyri ikki at siga ógjørlig, hjá fólki at fáa eyga á. Hildið verður, at veruliga prislækkingin ikki svarar til tolllækkingina á nakran hátt, tvørturímóti er nærum eingin munur, verður sagt.

4. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

9. apríl svaraði Jóngerð Purkhús fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin er soljóðandi:
1. Kann fíggjarmálaráðharrin vátta, at ein verulig tolllækking frá 46% til 28% upp á eykalutir til bilar er farin fram?
2. Um so er, hvussu kann tað so bera til, at almenningurin lítið og einki hevur merkt til hesa tolllækking?
3. Kann ráðharrin í fíggjarmálum syrgja fyri, at hesi viðurskifti verða kannað og fingin í rættlag skjótast møguligt.

Til 1.
Gjaldstovan avgreiðir tollingina av eykalutum til bilar eftir løgtingslóg nr. 100 frá 1. oktober 1986 við 28% av gjaldskyldugu virðinum, vanliga nevnt cif-virðið.

Til 2.
Ein lítil kanning hjá bilhandlarum av ávísum eykalutum vísir, at prísirnir yvirhøvur eru niðursettir nakað, t.d. fer ein kopling úr 365 kr. niður í 290, bremsuklossar úr 485 kr. niður í 390 kr.

Fyri vanliga stødd á persónbildekkum er prísurin hjá einum bilhandlara farin niður við umleið 125 kr. pr. dekk.

Havast má tó í huga, at tað tekur nakað av tíð, áðrenn tollniðursetingin slær heilt ígjøgnum, tí allir bilhandlarar høvdu goymslu av eykalutum, tollaðir eftir gomlu skipanini.

Til 3.
Eins og fyri aðrar vørur hevur Prísráð Føroya eftirlit við prísunum á eykalutum. Prísráðið er vorðið kunnað um henda fyrispurning og er biðið um at taka sær av málinum.

100-12 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi samferðsluviðurskiftum í Svínoy og Kalsoy

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Anfinni Kallsberg, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvussu langt er heildarætlanin fyri vegaføring í Svínoyar kommunu komin?
2. Er avgerð tikin um, hvar ein møguligur tunnil skal liggja?
3. Eru lendingarviðurskiftini yvir á Dal kannað?
4. Eru onnur lendingarviðurskifti sum t.d. í Havnini kannað?

5. Eru viðurskiftini kannað, hvar ein ferjulega í Kalsoynni liggur best, um »Ternan« skal røkja hesa sigling?
6. Er møgulig bátahavn og ferjulega saman kannað í Kalsoynni?
7. Hvør er møguligi kostnaðurin fyri hvørt av frammanfyri nevndu arbeiðunum?
8. Er ein tíðarætlan gjørd, nær hesi arbeiði skulu setast í verk og klár at taka í nýtslu?

Viðmerkingar:
Í 1985 og 1986 gjørdi Føroya Løgting viðtøkur um at kanna ymisk viðurskifti fyri at bøta um samferðsluviðurskiftini hjá svínoyingum og kalsoyingum.

Eg veit, at ávisar kanningar eru gjørdar á báðum støðum, men fyri at fáa eina meira nágreiniliga lýsing av støðuni fari eg at loyva mær at seta fram omanfyristandandi spurningar.

4. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

26. mars svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurtinginum soleiðis:

Svar

Gjørd eru skitsuprojekt av tunli yvir í Dal - longd u.u. 2500 m og u.u. 2000 m av vegi — og ferjuhavn har yviri, og eru hesi arbeiði mett at kosta eini 110-120 mió. kr. Skal tann ætlaða nyttan fáast burtur úr hesum arbeiðum, verður eisini neyðugt við ferjulegu inni í Sundum og eini hóskandi bilferju at røkja sambandið til Svínoyar, so tann samlaði kostnaðurin fer at verða omann fyri 150 mió. kr.

Við tað at talan er um so stórar upphæddir, verður mett rættast at bíða við støðutakan, til vit møguliga hava fingið tær fyrstu royndirnar við undirsjóvartunlum, ti vísir tað seg at liggja væl fyri at gera ein tílíkan her, kostar hann ikki meira enn ferjusambandið.

Rættiligar kanningar av landingarviðurskiftunum Yviri í Dal og í Havnini eru ikki gjørdar.

Semja er um, at best egnaða staðið til ferjulegu á Kalsoynni er á Syðradali. Leysligt projekt er gjørt og skipað soleiðis, at lætt er at gera pláss fyri 12-15 bátum innanfyri.

Kostnaðurin er mettur til u.u. 15 mió. kr.

100-13 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi siglingarrennu gjøgnum Haraldssund

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Tordi Niclasen og Asbjørn Joensen, løgtingsmonnum, sum var soljóðandi:

Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu langt er komið við siglingarmøguleika ígjøgnum Haraldssund og sambandi um sundið.

Viðmerkingar:
Tá ið samtykt varð í sini tíð, at byrging um Haraldssund, varð hetta gjørt í samráð við teir fiskimenn, ið hava fyri neyðini at troyta sigling ígjøgnum Haraldssund.

Byrgingin gjørdist tí soleiðis, at møguleiki varð fyri at gera tær berandi soylurnar á miðjum sund og síðani at taka byrgingina upp aftur, so sigling gjørdist møguleiki.

Hetta arbeiðið átti at verið byrjað, men er okkum kunnugt einki enn fyriskipað.

Tá ið nú fiskimaðurin ótolnast, verður sett landsstýrismanninum í samferðslumálunum spurningur hesum viðvíkjandi.

Tá hetta mál er av almennum áhuga, er rímiligt, at svarið gjørt alment frá tingsins røðarapalli.

4. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

7. apríl svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Á landsstýrisfundi 21. juni 1985 varð samtykt, at siglingarrenna skuldi gerast í sambandi við byrgingina um Haraldssund, og 19. februar 1986 samtykti landsstýrið eftir tilmæli frá undirritaða:

1) at bygt verður eftir uppskoti nr. 6
2) at peningur verður avsettur til hetta endamál á fíggjarlógini fyri 1987
3) at grótfyllingin av byrgingini verður uppaftartikin, og at fylt verður í ein boga uttanum, har soylurnar skulu standa
4) og at tilboð verða heintað uppá gerð av soylum og brúgvagerð.

Í stuttum kann sigast um uppskot nr. 6, at soylurnar skulu setast niður í botn, t.e. 15 m dýpi, og breiddin millum soylurnar 31,7 m. Fríhæddin er 10 metrar og kostnaðurin mettur til umleið 40 mió. kr.

5 mió. kr. eru avsettar á fíggjarløgtingslógini fyri 1987, og er ætlanin at brúka hesa upphædd til at byggja soylurnar fyri.

Landsverkfrøðingurin er biðin um at skipa so fyri, at arbeiðið uppá soylurnar verður útboðið sum skjótast.

Tilsamans seks alternativ uppskot eru gjørd av siglingarmøguleikum í Haraldssundi úr 28 mió. kr. upp í 40 mió. kr. tilsamans fyri alt arbeiðið, byrging og siglingarrennu.

Kostnaðarætlanin umfatar: gról í byrging, brúgvagerð, bilverju á byrging, ljósmastrar, siglingarljós, asfalt og fendaraverk.

Annars kann verða upplýst, at tær útbyggingarætlanir, sum vóru knýttar at hesi viðgerð, hava verið:

1) byrging um Haraldssund, 2) siglingarmøguleiki í sambandi við byrging, 3) Kunoyartunnilin og 4) aling í Haraldssundi.


Tá henda samgongan varð skipað, varð gjørd semja um so skjótt sum gjørligt at gera eina prioritering av hesi útbyggingarætlan.

Orsøkin til, at spurningurin tá hevði skund, var fyrst og fremst tann, at útbyggingin av Haraldssundi fór fram, uttan at tað ber til at siga, at ein planlegging lá aftanfyri, og var tað henda støða, sum vit als ikki kundu góðtaka.

Síðani tá er útbyggingin í Haraldssundi komin í fasta legu; landfast er millum Borðoynna og Kunoynna við byrging, samtykt er at gera siglingarrennu, Kunoyartunnilin er skotin ígjøgnum, og alingin í Haraldssundi hevur somuleiðis fingið tað innihald, sum siktað varð ímóti í kjakinum um útbyggingarætlanina í Haraldssundi.

Annars kann verða lagt afturat, at av kønum monnum verður upplýst, at Haraldssund er væl egnað til aling av síli og laksi.

Eingin orsøk er til at ótolnast, arbeitt verður í tráð við landsstýrissamtyktina frá 19. februar 1986.



761

MÁL: *Fast samband um Haraldssund*		TEKNING NR. *216*	LITRA
		MÁL NR. *596*	
ARBEIDSANARI *Landsverkfrøðingurin*		DAGFEST *29.05.85*	
EVNI *Uppskot*	*6*	MÁT *1:500*	
Yvirlitsteigning		TEKNAD *JP GR*	
		KANNAD	

LANDSBYGGIFELAGIÐ P/L · RÁDGEVANDI VERKFRØÐINGAR · ARKITEKTAR LBF
LBF · GRØNLANDSFØLKIÐ · POSTBOX 226 · 3800 TÓRSHAVN · FØROYAR · TELEFON 14744 · TELEX 81321

100-14 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi siglingarrennu gjøgnum Haraldssund

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Heina O. Heinesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvør er grundin, at landsstýrismaðurin ikki heldur seg til tær samtyktir, sum eru gjørdar um siglingarrennu í Haraldssundi, samtykt á landsstýrisfundi 20. mars 1986?
2. Er nøkur kanning gjørd av Hvannasundi, síðani tað var tipt fyri skjótt mongum árum síðani, her hugsi eg serliga um dálkingarvandan og siglingarnøguleikarnar?

Viðmerking til 1:
Í juni mánað eru 4 ár, síðani byrjað varð at fylla grót út í Haraldssundi í sambandi við aling, varð sagt.

Hetta var í tráð við løgtingsmál nr. 36/1980, pkt. 3, á bls. 227 í Tingtíðindum sama ár.

Hetta mál varð framlagt av undirritaða, tí talan var um at gera grótkast í sambandi við ta aling, ið fór fram í Kunoyarnesi tá. Ístaðin fyri at leggja grótkast suður úr Nesinum varð hildið rættast at byrja upp á byrgingina um Haraldssund.

Nú liggja so tvey alibrúk suðuri í Kunoyarnesi. Um streymurin verður reguleraður við eini siglingarrennu, gevast teir bestu alinøguleikarnir, sum eru í Føroyum. Um rætt verður farið fram, t.v.s. at vit fremja ta samtykt, sum er gjørd í hesum máli, so kunnu vit úthyggja alingina í Haraldssundi munandi við fleiri alibrúkum, bæði sunnan fyri og norðan fyri byrgingina. Herafturat kemur, at sundið verður opið fyri sigling aftur, og er hetta nakað, sum er lovað útróðrarmonnum.

Tað skuldi tí ikki verið nakað ivamál at sett hesa samtykt í verk so skjótt sum gjørligt. Hotta kemur at fáa landsbúskaparligan týdning í framtíðini.

26. juni 1985 varð ein nevnd vald av landsstýrinum — hin sokallaða Haraldssundsnevndin. Hvat er vorðið av hesi nevnd? Er hon liðug við arbeiði sítt?

Viðmerkingar til 2:
Tað kundi verið áhugavert at lingið at vita, hvussu henda tipping hevur ávirkað umhvørvið í sundinum, og eisini, hvussu skilið verður um nøkur ár.

Tað kann ikki vera nakar ivi um, at tað hevur stóran týdning fyri útróðurin, um tað gjørdist siglandi gjøgnum Hvannasund aftur.

Nú er tað soleiðis, at eingin vil hava streymin aftur í sundið, men tað hevði verið gott, um tað gjørdist møguligt at regulera streymin í sundinum.

Hetta kundi latið seg gjørt, um ein byrging varð gjørd aftrat í sambandi við eitt alibrúk (ella bátahavn).

Henda byrging skuldi ikki verið til bilferðslu, men bert til at regulera streymin í sundinum. á miðjuni skuldi verið eitt portur, sum kundi opnast til sigling. Eisini skuldu rør verið løgd í botnin báðumegin við, soleiðis at nakað av streymi kundi verið alla tíðina.

4. mars varð við 22 0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

100-15 Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi flytan av fyrisiting lønjavningargrunsins

Ár 1987, hósdagin 6. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær verður fyrisitingin av lønjavningargrunninum flutt vestur í Vágar?

Viðmerkingar:
Ferð eftir ferð verður — bæði av kommunalpolitikarum eins væl og landspolitikarum — víst á, í hvussu stóran mun miðsavningarpolitikkurin hjá sitandi samgongu fær skaðiligt árin á bygnaðin av føroyska bygdasamfelagnum.

Meðan peningastreymurin til miðstaðarøkið økist í stórum, verða bygdirnar í størri og størri mun við sviðið soð. Eitt nú játta sitandi landsstýri og samgongga a tingi yvir 100 almenn størv árliga í Suðurstreymi, meðan tey, sum játtað verða úti um landið, kunnu teljast á fingrunum á aðrari hondini! Allir nýggir almennir stovnar verða lagdir í ella kring Tórshavn. Fyri bert at nevna nakrar av teimum, sum í løtuni eru upp á tal, kann peikast á ta nýggju menningarstovuna, ta nýggju hálkubreytina, ta nýggju fiskirannsóknarstovuna og nú seinast ta nýggju landsmiðstøðina fyri undirvísingarumboð. Uppskot til samtyktar frá undirritaða, har heitt varð á landsstýrið um, at nýggir almennir stovnar í mest møguligan mun verða lagdir úti á bygd, fekk bert 15 atkvøður og varð sostatt felt í løgtinginum.

Væl kann tað vera, at einstakir stovnar eru førir fyri at veita eina betri tænastu, um teir liggja á miðstaðarøkinum heldur enn úti á bygd, men so er ikki í øllum førum og so langt burtur frá tí. Lá fiskirannsóknarstovan ikki nógv betur t.d. á Sandoynni ella í Vágum, enn hon gjørdi í Tórshavn? Jú, sjálvsagt — hon lá tættari at sjálvari fiskivinnuni og kom meira beinleiðis undir ávirkan av teimum, sum hon, tá alt kemur til alt, skal tæna.

Soleiðis t.d. við Vaktartænastuni, stovnunum hjá landsverkfrøðinginum og soleiðis í so mongum øri. Men eisini búskaparpolitikkur samgongunnar ber á sama borðið. Meðan tær játtanir, sum í høvuðsheitum fara út á bygd, verða niðurskornar at merginum, t.d. játtanir til havnir, lendingar, studnings- og landsvegir, menningargrunnin, grunnin til ídnaðarfremjandi endamál, studulin til fiskivinnuna o.s.fr., so bólgna upphæddirnar til landsfyrisiting til almennu stovnarnar, heilsumál, skúlafyrisiting, vísindi, bókmentir, list o.s.fr. ella til allar tær konti, har meginparturin av peninginum fellur í Suðurstreymoy uttan fyrilit. Nýggju inntøkulógirnar medvirka jú eisini í ovurstóran mun til kapitalflutningin av bygd til bý.

Úrslitið av hesum politikkinum gerst alt klárari, meginparturin av fólki okkara trunkar seg saman í meginøkinum, har útboðið av arbeiðsplássum er ovurstórt, og har úthoðið av øllum tí, sum dagliga kann lætta um í húsarhaldinum og annars stytta um fritíðarstundirnar, líkaleiðis er og verður nógv, nógv størri enn úti á bygdunum kring oyggjarnar, har fólkið gerst alt fámentari.

Mangir eru teir, sum tosa um at broyta hesa gongd, men trupult tykist vera at fáa ordini støðfest við gerðum.

Td. hevur Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, minst tvær ferðir boðað umboðunum fyri Føroya Kommunufelag frá, at Lønjavningargrunnurin skal flytast vestur í Vágar. Men higartil er mær vitandi lítið fløkiligt hent í málinum. Tvørturímóti hevur meirlutin í landsstýrinum loyvt lønjavningargrunninum saman við Húsalánsgrunninum og Menningargrunninum at keypt eina stóra húsaogn við Hoyvíksvegin í Tórshavn.

Fyri mær at síggja kann tað koma at ganga long tíð, áðrenn fráboðanin gerst veruleiki, og tí loyvi eg mær at spyrja landsstýrismannin.

10. mars varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

13. apríl svaraði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin er soljóðandi:
»Nær verður fyrisitingin av lønjavningargrunninum flutt vestur í Vágar?«

Svar:
Tað er rætt, at landsstýrið kannar møguleikarnar fyri, at almennir stovnar kunnu eisini verða lagdir á bygd og úti um landið.

Tað er eisini rætt, at tað í hesum sambandi hevur verið nevnt at flyta Lønjavningargrunnin vestur í Vágar. Men tað er enn eingin avgerð tikin um nakra tílíka flyting, og landsstýrið kann tí ikki siga, um ella nær fyrisitingin av Lønjavningargrunninum verður flutt vestur í Vágar.

Tað kann verða lagt afturat, at Felagskommununarnar í Vágum hava sýnt stóran áhuga fyri spurninginum og víst á Sandavágs kommunu, sum segði seg hava høli til taks. Nú er tó líkningardeildin í Vágum flutt inn í hesi høli.

100-16 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi flutningssambandinum um Vestmannasund

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið nakrar ætlanir um *fyribils* at bøta um flutningssambandið um Vestmannasund?
2. Um so er, so hvørjar?
3. Kann flutningsgjaldið um sundið væntast at verða lækkað í næstum?

Viðmerkingar:

Sambært tíðindaskrivi frá landsstýrismanninum er landsverkfrøðingurin komin væl áleiðis at gera skitsuprojekt av einum undirsjóvartunli um Vestmannasund, og tíbetur er nógv, sum bendir á, at tann loysnin, sum felagskommunan í Vágum skjýtur upp, er góð og í størri og størri mun fær undirtøku millum politisku flokkarnar.

Tað kann tí av røttum metast, at ein positiv politisk avgerð verður tikin innan fyri rímiliga tíð viðvíkjandi fasta sambandinum millum Vágarnar og meginøkið.

Hetta fegnast vit um í Vágum. Hinvegin mega vit síggja í eyguni, at hóast so væl gongst í hond, sum tað nú einaferð er gjørligt, verður valla nakað fast samband tikið í nýtslu fyrrenn um eini 5-6 ár.

Fyrstu nógvu árini verður sostatt sambandið rikið við ferjum.

Sum er røkir »Sam« sum kunnugt siglingina, meðan gamla »Tjarnan« hjálpir til viðhvørt, tá mest á stendur.

Hóast fleiri ferðafólk umnast betur umborð á »Tjarnuni« enn á »Sam«, hevur hon tað lýtið, at hon ikki kann taka større lastbilar (og bussar) við tí til fylgju, at hesir alt ov ofta koma at standa langa tíð og bíða eftir flutningsmøguleika. Hesir lastbilar eru dýrir at leiga, og hevur tí mangur virkisleiðari verið noyddur at ásannað, hvussu nógv truplari og meira kostnaðarkrevjandi tað er at reka vinnuligt virksemi í Vágum sammett við aðrastaðni í landinum.

Serliga væl merkist hetta, nú bussarnir hjá bygdaleiðum verða fluttir fleiri ferðir dagliga aftur og fram um sundið.

Orsakað av tilvildarligu siglingini hjá »Tjarnuni« er bíðirøðin av privatbilum eisini mangan nógv longri enn neyðugt og nógv longri, enn hon hevði verið, um betur varð fyriskipað.

Undirritaði dugir illa at siggja tað skilagóða í at gera nýggja ferjulegu inni á Fjørð í Vestmanna, vildi nógv heldur mælt til at gjørt vanliga atløgusiðu í sambandi við ídnaðarøkið har inni.

Nýggja ferjulegan komur at økja um siglingartíðina og økja teir nevndu trupulleikarnar samsvarandi.

Eitt er vist, eg tað er, at viðurskiftini eiga ikki at halda fram óbroytt komandi 5-6 árini.

Eitt gott framstig hevði verið at skift »Ternuna« út við eitt annað brúkt skip nøkulunda á stødd sum »Sam« og síðani latið bæði skipini røkt rutuna eftir eini vælskipaðari ferðaætlan við t.d. fráferðum hvønn hálvan tíma av Oyrargjógv ávikavist Vestmanna frá kl. 7 á morgni til kl. 10 á kvøldi. Tá høvdu vit eitt ferjusamband, sum vit kundu livað við, hartil at festa sambandið er komið, og báðar ferjurnar kundu verið seldar. Eisini sjálvt flutningsgjaldið um Vestmannasund er nógv ov høgt sammett við gjaldið á øðrum rutum nyggjanna millum. Tað líkist ongum, at vit skulu gjalda tað sama, sum aðrar gjalda fyri eina tein, sum er fleiri ferðir longri.

Gjaldið um Vestmannasund eigur av røttum ikki at verða meira enn helvt av gjaldinum millum Tórshavn og Skálafjørðin ella Klaksvík og Leirvík — helst minni, so her fari eg at heita á landsstýrismannin at fáa broyting í til tað betra.

Sostatt loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum soljóðandi fyrispurningar,

Fyrispurningurin varð ikki svaraður.

100-17 Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi útbygging av Hotel Tórshavn ella keyp av húsi

Ár 1987, týsdagin 10. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jákupi Lindenskov, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið at bøta um pláss- og tilhaldsviðurskifti hjá sjúklingum á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn?

Viðmerkingar:

Tað eru nú mong ár síðani, Hotel Tórshavn í Keypmannahavn fór undir virksemi at taka ímóti og vera tilhald hjá fólki, sum leitar í heilsubótarørindum til Danmarkar. Eisini er hotellið tilhald hjá teimum, sum fylgja við sjúklingunum, sum liggja á sjúkrahúsi ella ganga til ambulantar viðgerðir.

Tann tíð, hotellið hevur virkað, hevur ríkiliga prógvað, at brúk er fyri tílíkum stovni. Men nú er vorðið trongt. Roynt hevur verið at víðka um rúmini í sama bygningi, men tvørleikar her hava tikið seg upp, sum tykjast at forða fyri einari bráðneyðugari loysn.

Ein onnur loysn er verd at taka upp til umhugsingar. Eingin ivi er um, at tað er brúk fyri tilhaldi fyri føroyskar sjúklingar, ið megu leita til Keypmannahavnar í sjúkra- og heilsuørindum. Tað er í tøkum tíma at taka spurningin upp um betur hóskandi høli til endamálið, t.d. at keypa hús til hetta endamál.

13. mars varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

Svar

Í hesum málinum hevur Jákup Lindenskov 6. mars 1987 sett mær hendan spurning:

»Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið at bøta um pláss- og tilhaldsviðurskiftini hjá sjúklingum á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn.«

Eftir áheitan í 1974 frá Rigshospitalet og ávum Karolinu Petersens varð sjálvognarstovnurin Hotel Tórshavn grundaður í 1976.

Endamál stovnsins var at hýsa sjúklingum, sum føroysku sjúkrahúsini senda til Danmarkar til innleggingar ella ambulanta viðgerð á serdeildum í Keypmannahavn mest á Rigshospitalet.

Stovnurin leigaði høli á 3. hædd og eisini nakað av 4. hædd í Gothersgade 160, 24 sengir til sjúklingar vóru til taks. Seingjanormeringin var nóg stór at byrja við, men sum tíðin loið, øktist talið av sjúklingum, soleiðis at tað hava verið upp ímóti 40 sjúklingar og fólk sum fylgja við teimum í senn á hotellinum.

Í samráð við landsstýrið gjørdi nevndin fyri stovnin av at royna at leiga alla 4. hædd afturat, seingjatalið kundi tá koma upp á 48. Figgjarnevndin játtaði neyðuga peningin, 1,2 mió. kr., til umbygging og montering.

Eigari og leigari vóru samdir um leigutreytirnar. Eftir stóð góðkenning frá byggimyndugleikunum í Københavnar kommunu. Men tá hendir tað óvarda, at byggimyndugleikarnir í januar 1987 sýta at geva loyvi til at innrætta hæddina til hotell. Nú kann tað vera, at sýtingin hevur sína grund í eini misskiljing av orðinum »hotell« í hesum sambandi, og landsstýrið vil, um so er, gera eina roynd at bøta um hetta.

Landsstýrið hevur ikki, so leingi hesin spurningur ikki er greiddur, ítøkiligar ætlanir um aðra loysn, eitt nú keyp av onkrum húsi.

Lagt verður afturat, at frá 1. november 1986 er sjálvognarstovnurin tikin av og Hotel Tórshavn lagt undir sjúkrahúsverkið.

100-18 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi endurskoðan av lóggávu um trygging

Ár 1987, týsdagin 3. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jákupi Lindenskov, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Vil landsstýrið í sambandi við vegaføring til Gomlu Rætt umhugsa tunnil gjøgnum Kirkjubøreyn?

Viðmerkingar:
Í ætlanini um ferjulegu við Gomlu Rætt í Kirkjubø er neyðugt at gera nýggja vegaføring at samanbinda við veganetið í Havn.

Ferjuleguætlanin fer at økja heilt munandi um ferðsluna millum Havnina og Gomlu Rætt. Vegurin eftir Velbastaðhálsi gongur eisini fram við nýggja bústaðarøkinum í Havn úti í Havnardali. Politikkurin á hesum samferðsluøki hevur jú verið, at vegaføringar skulu ganga sum mest burtur frá bygdum øki, og má hetta eisini galda fyri nevnda strekki. Vegaføringin við tunli fer at vera fíggjarliga líka so forsvarlig sum nýggjur vegur. Við tunli gerst strekkið munandi styttri, samstundis sum tað eisini skapar væl betri ferðslutrygd. Ferðslutrygd eisini fyri íbúgvarnar vestanfyri, ikki minst í ringum koyrilíkindum.

13. mars varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

26. mars svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Síðani avgerðin varð tikin um at leggja ferjulegu við Gomlurætt, hevur verið arbeitt við ymiskum veglinjum til ferjuleguna. Enn hava tunnillinjur ikki verið upp á tal, tí tað er einki, sum í fyrstu atløgu talar fyri, at ein slík hevur serligar fyrimunir.

Áðrenn endalig støða verður tikin, verða tó meiri nágreiniligar metingar gjørdar um hetta.

100-19 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi endurskoðan av lóggávu um trygging

Ár 1987, týsdagin 31. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Agnari Nielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Fyrispurningurin er soljóðandi:

Nær setlar landsstýrið at leggja fram tað uppskotið til nýggja endurskoðaða lóggávu um tryggingarsamtakið í Føroyum, sum Føroya Løgting álegði landsstýrinum at gera í apríl 1986?

Viðmerkingar:

Tann 20. februar 1986 legði Sambandsflokkurin fram soljóðandi uppskot til samtyktar: »Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið eina nýggja lóggávu og nýggjar reglur fyri trygging í Føroyum, sum inniber at einkarrættarin til trygging verður avtikin, og at peningur, bundin og vunnin frá trygging, framvegis verður verandi í Føroyum.«

Í viðmerkingunum bleiv víst á, at galdandi reglur um trygging eru gamlar og ótíðarhóskandi. Eisini bleiv víst á, at tað undir viðgerðini av nýggju brunalógini aftur kom týðiliga fram, at neyðugt er at gera nýggjar lógir og reglur á tryggingarøkinum, og í hesum sambandi at avtaka galdandi einkarrætt, ella monopol.

Málið bleiv viðgjørt í ídnaðarnevndini, og setti ein meiriluti fram hetta uppskot til samtyktar: »Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri ólavsøkutingið komandi uppskot til nýggja endurskoðaða lóggávu um tryggingarsamtakið í Føroyum.«

Hetta uppskot til samtyktar bleiv samtykt.

Út frá hesum verður tí sett fram hesin fyrispurningur.

3. apríl varð samtykt við 20-0 atkvøðum, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

14. apríl svaraði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:


Svar

Fyrispurningurin:
»Nær ætlar landsstýrið at leggja fram tað uppskot til nýggja endurskoðaða lóggávu um tryggingarsamtakið í Føroyum, sum Føroya Løgting álegði landsstýrinum at gera í apríl 1986?«

Svar:
Landsstýrið samtykti á fundi 19. juni 1986 at seta ein arbeiðsbólk at kanna tryggingarlóggávuna og tryggingarviðurskiftini, og at í arbeiðsbólkin skuldu koma at sita: ein aktuarur, ein løgfrøðingur og ein granskoðari. Hetta er eitt stórarbeiði at fara undir.


Av tí at umsitingin hevur havt ov nógv mál at taka sær av, er hetta arbeiði ikki komið nakað ávegis, men verður hetta arbeiðið nú prioriterað frammarlaga.


RED: 10 X



Nasjonalbibliote

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12





RE

Nas

N
N

Telephone: +47 7

LØGTINGS
TIDINDI

1986

Løgtingstíðindi 1986 — Bind B

Løgtingstíðindi

1986

Bind B

Skjøl til løgtingstíðindi

Tórshavn 1991

Løgtingstíðindi 1986.
© Føroya Løgting.
Lagt til rættis: Esther Bech.
Fotosatsur, umbróting: Pf Blaðstarv.
Prent: Haynar Prent.
Hefting: Bókavirkið.

INNIHALDSYVIRLIT BIND B
Skjøl til løgtingstíðindi 1986

			Bls.	Løg tings. mál
Skjal	1	Landskassaroknskapur 1986	7	
-	2	Fylgiskjøl til løgmansrøðuna 1986	47	
-	3	Rættargangslógin »Udkast til forslag til lov for Færøerne om rettens pleje«	103	1
-	4	Rættargangslógin	117	1
-	5	Broyting í løgtingslóg um idnaðargrunn	119	4
-	6 A	Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1987	121	5
-	6 B	Fylgiskjøl til fíggjarløgtingslóg 1987	161	5
-	7	Sáttmáli ímillum Føroya landsstýri og ríkisstjórnina í kongaríkinum Danmark øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska tjóðveldinum hinumegin um sínámillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið	534	34
-	8	Sáttmáli um vernd av ferðandi villum djórasløgum (Bonn-sáttmálin)	538	44
-	9	Álit um Fróðskaparsetur Føroya	570	47
-	10	ST-sáttmáli um gíslatøkur	668	56
-	11	Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi 1987 A-C	680	58
-	12	Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi 1987 A-F	687	59
-	13	Keyp av húsaognum í Jónas Broncksgøtu	693	105
-	14	Um at lýsa sáttmála um stovnan av norðurlendska menningargrunninum fyri Útnorður at galda í Føroyum	698	109
-	15	Um at seta í gildi í Føroyum Haagsáttmálan frá 2. oktober 1973 um viðurkenning og fremjing av avgerðum um undirhaldsskyldu	703	110
-	16	Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág	713	119

-	17	Broyting í løgtingslóg um sjómansskúlaútbúgving . . .	748	120
-	18	Ókeypis koppseting ímóti barnasjúkum	775	121
-	19	Broyting í donsku stuðulsskipanini til heimastýrið . . .	782	133

LANDSKASSIN

Rakstrarroknskapur 1986

og

fíggjarstøða pr. 31. desember 1986

Viðmerkingar til landskassaroknskapin 1986

Fylgjandi **ognir**, sum eru fíggjaðar yvir § 13: Nýggir vegir, brýr, breiðkan av brúm og umsitung av vegum, eru ikki upptiknar í landskassans roknskapi:

Skerv- og asfaltverk	Byggi-kostnaður	Niðurskrivað til pr. 31.12.86
Skervverkið í Porkeri	8.081.768,00	5.014.347,00
Skervverkið á Sandi	1.419.318,00	356.612,00
Skervverkið í Sandavági	4.094.860,00	2.292.052,00
Skervverkið í Hundsarabotni	19.290.630,00	6.946.802,00
Skervverkið á Lambareiði	49.535.806,00	30.008.281,00
Bitumengoymslan í Porkeri	562.552,00	345.442,00
Bitumengoymslan á Sandi	340.511,00	290.943,00
Bitumengoymslan í Hósvík	11.752.810,00	5.212.964,00
Asfaltverkið í Hundsarabotni	6.531.017,00	2.370.784,00
Asfaltverkið á Lambareiði	8.008.638,00	4.085.148,00
	109.617.910,00	56.923.375,00

Smiðjur og goymsluhús	Byggi-kostnaður	Niðurskrivað til pr. 31.12.86
Maskinmiðstøðin í Kollafirði	8.550.000	4.940.000
Goymsluhús í Kollafirði	2.000.000	1.472.000
Smiðjan á Lambareiði	220.000	99.750
Smiðjan í Norðdepli (gamla)	80.000	18.000
Smiðjan í Hvannasundi	1.000.000	860.000
Smiðjan á Sandi (gamla) umvald	500.000	475.000
Smiðjan á Sandi (nýggja)	2.200.000	1.030.000
Smiðjan í Øravík	3.000.000	2.850.000
Smiðjan á Kallsoynni	100.000	59.000
Goymsluhús í Havnardali	200.000	171.000
Goymslu- og vaktarhús í sb. við kavagr. á Oyggjarv.	250.000	214.500
Goymsluhús norðuri við Streymin	200.000	180.000
Goymsluhús á Grind á Eiði	200.000	180.000
Servicekont. á Lambareiði	275.000	247.000
Servicekont. í Haraldsundi	400.000	361.000
Goymsluhús á Stykkinum	200.000	175.000
Goymsluhús í Sørvági	200.000	175.000
	19.575.000	13.507.250

Fylgjandi **skuld** pr. 31. des. 1986 er ikki bókførd í landskassans roknskapi:

Keyp av maskinum upp á avgjald	9.375.161,00
Keyp av útgerð til skervverk	6.140.000,00
	15.515.161,00

Landskassans **útlandaskuld** tann 31. desember 1986 sær soleiðis út:

		Skuld 31.12.86	Bókførd skuld	Skuld við kursi 31.12.86
Exportfinans	Nkr.	5.642.175,90	5.283.801,47	5.804.106,35
Kreditbank, Luxembourg	Bfr.	16.000.000,00	2.400.000,00	2.908.160,00
Westdeutsche Landesbank	DM	7.960.000,00	22.537.997,96	30.010.792,00
Algemene Bank, Holland	Hfl.	10.909.090,91	31.306.432,55	36.404.727,24
N. V. Bank voor Nederland	Hfl.	18.000.000,00	50.187.292,27	60.067.800,00
Manufactor Hanover Ltd.	US-dollar	6.333.333,35	46.113.192,70	47.869.233,46
3 lán agent Handelsbanken	US-dollar	3.500.000,00	20.167.630,00	26.454.050,00
6 lán agent Privatbanken	US-dollar	3.500.000,00	17.178.198,85	26.454.050,00
Nordfinanz Bank, Zürich	Sfr.	10.000.000,00	41.876.625,00	46.042.000,00
Nordic Bank, London	Sfr.	2.871.428,58	11.709.111,43	13.220.631,47
			248.760.282,23	295.235.550,52

Viðvíkjandi landskassans **veðhaldsskyldum** er at siga, at sambært yvirlit (fylgiskjal til landskassarokuskapin) veðheldur landskassin 31.12.86 fyri kr. 1.717.500.000,00, og av hesum eru kr. 160.000.000,00 gjaldkomnar.

Tað er gjaldstovuni kunnugt, at roknskapurin viðvíkjandi landskassans veðhaldsskyldum ikki er eftirfarandi á ávísum økjum m.a. orsakað av tørvandi upplýsingum, ið ikki eru komnir gjaldstovuni í hendi.

Undir landskassans bruttoinntøkum framgongur, at endurgjøld ríkiskassans eru 327.081.858,55 kr., men her skal tilskilast, at 134.179.208,29 kr. ikki er við í nevndu upphædd. Hetta er ríkiskassans partur av rakstrinum av sjúkrahúsunum, sum hava sjálvstøðugt on-line roknskaparhald við edv-systeminum hjá gjaldstovuni.

Hesin roknskapur er prentaður soleiðis:

400 eintøk av ársroknskapinum 1986
12 eintøk av kontolistum
12 eintøk av rakstrarstøðum, tó ikki § 13-1
12 eintøk av rakstrarstøðum § 13-1
12 eintøk av landskassans veðhaldsskyldum

Rakstrarroknskapur landskassans fyri fíggjarárið 1986

(Samandráttur)

		Roknskapur	Fíggjarlóg
Inntøkur:			
(§ 1)	Skattir	988.172.028,35	867.690.000,00
(§ 2)	Toll- og framleiðslugjøld	855.041.682,29	678.000.000,00
(§ 3)	Onnur gjøld	2.200.788,48	1.590.000,00
(§ 4)	Inntøkur av spæli	1.111.107,14	1.000.000,00
(§ 5)	Rentur og vinningsbýti v.m.	÷77.842.980,00	: 46.000.000,00
(§ 6)	Landsstovnar	÷52.650.192,38	÷ 105.095.000,00
(§ 7)	Partur av avlopi danska tjóðarbankans	10.706.819,00	15.000.000,00
(§ 8)	Ymsar inntøkur	391,42	5.000,00
		1.726.739.644,30	1.412.290.000,00
Útreiðslur:			
(§ 6)	Landsstovnar (sjá undir inntøkum)		
(§ 10)	Løgtingið	10.463.233,10	10 785.000,00
(§ 11)	Landsumsitingin	105.436.455,60	102.687.000,00
(§ 12)	Heilsumál	115.264 182,19	114.926.000,00
(§ 13)	Samferðslumál, í grunnar	112.000.000,00	112.000 000,00
(§ 13)	Vegir, brýr v.m.	107.715.940,80	108.200.000,00
(§ 14)	Skúlamál	142.322.260,23	136.814.000,00
(§ 15)	Vísind, bókmentir og list	61.069.674,18	64.684.000,00
(§ 16)	Fiskivinna, sigling o.t	326.376.370,61	316.460.000,00
(§ 17)	Landbúnaður og matrikulering	36.367.980,65	36.622.000,00
(§ 18)	Handil, iðnaður v.m.	38.853.240,56	35.697.000,00
(§ 19)	Almannamál	255.498.861,96	244.299.000,00
(§ 20)	Pensjónsútreiðslur	5.707.264,04	4.530.000,00
(§ 21)	Effektivar veðhaldsbindingar	50.000.000,00	50.000.000,00
(§ 22)	Aðrar og óvissar útreiðslur	3.368.483,44	3.135.000,00
(§ 23)	At leggja í ymsar grunnar v.m.	19 787.233,79	÷34.109.000,00
(§ 24)	Avdráttur av lánum	20.997.000,00	43.017.000,00
(§ 25)	Avskrivingar	58.603.000,00	62.166.000,00
(§ 26)	Ymsar ognarútreiðslur	239.506,43	800.000,00
(§ 27)	Rakstrarvinningur	256.688.956,72	77.000,00
		1.726.739.644,30	1.412.290.000,00

Fíggjarstøða landskassans pr. 31. des. 1986

(Samandráttur)

		Aktiv	Passiv
(§ 30)	Kassa-, banka-, sparikassa- og giro-peningur	68.485.199,57	
(§ 31)	Virðisbrøv	12.846.591,00	
(§ 32)	Útlán úr landskassanum (inc. ferðaforskot, tollkredit og alimentatión)	150.651.962,65	
(§ 33)	Inntøkueftirstøður	416.422.597,67	
(§ 34)	Aktiv hjá grunnum (innistandandi, útlán v.m.)	873.748.202,79	
(§ 35)	Aktiv hjá deponentum	11.543.486,81	
(§ 36)	Millumrokningar við kommunur		40.529.945,52
(§ 36)	Millumrokningar við landsstovnar		14.395.379,82
(§ 37)	Fastar ognir og anlegg	21.421.438,17	
(§ 38)	Skip	113.617.434,15	
(§ 39)	Millumrokningar við nýtt fíggjarár		92.772.198,65
(§ 40)	Millumrokningar, skuld		34.638.576,10
(§ 41)	Lán		499.340.593,23
(§ 42)	Deposita		14.688.717,77
(§ 44)	Grunnar		822.066.135,86
(§ 45)	Fløgur fíggjað við lánum	110.212.560,69	
(§ 46)	Kapitalkonto		28.191.842,99
(§ 50)	Refusiónsmillumrokningar	12.422.946,89	
(§ 52)	Aliráðið	161.394,75	
(§ 61)	Bileftirlitsstøð o.a.	11.778.531,52	
	Rakstrarvinningur		256.688.956,72
		1.803.312.346,66	1.803.312.346,66

Viðvíkjandi ábyrgdum sjá undir fororðinum.

FØROYA GJALDSTOVA, tann 30. desember 1987.

Heri Mohr Jákup Augustinussen

Specifikatión til 3000/6300 (§ 13)

3000	Anlegg av vegum		28.556.636,80
3100	Kommunal arbeiði		+96.388,87
3200	Tunnil. Húsar-Mikladal		43.430.567,58
3300	Áhøtur av vegum		7.046.281,79
3400	Viðlíkahald av vegum		13.605.954,19
3500	Vegarekkverk		1.089.981,08
3600	Kavagrevstur		3.885.689,53
3700	Vegstudningur		7.872.602,65
3800	Ferjulegur. viðlíkahald		4.142.849,73
3900	Astallering, gamlir vegir		4.188.527,02
5600	Mobil amboð - rakstur/keyp		21.172.514,94
5700	Smiðjur		11.537.882,99
5800	Skervverk		6.936.659,90
5900	Asfaltverk		9.507.498,95
6000	Havnir	43.591.916,34	
6100/6800	Lendingar og bátahavnir	30.126.959,44	
	Mótrokningar	+73.718.875,78	0,00
			162.877.258,38

Specifikatión

til rakstrarroknskapin fyri fíggjarárið 1986

INNTØKUR

			Roknskapur	Fíggjarlóg
(§ 1) **Skattir:**				
1108	Samtáðarskattur A & B	862.570.974,49		
1108	Partafelagsskattur	81.262.525,00	943.833.499,49	831.190.000,00
1108	Skattur aðrenn 1/4/84		-6.610.469,00	
1108	40%-skattur		64.485,90	
1108	Royalty avgjald		3.950,00	
1108	P/F-vinningsgjald 20%		12.661.260,76	
1108	Eftirlønargjald 35%		216.213,88	
1108	Sjómansskattur		6.417.340,00	8.000.000,00
			956.586.281,03	839.190.000,00
1804	Vegskattur		13.000.170,60	16.000.000,00
1702	Rentuskattur		18.585.576,72	12.500.000,00
(§ 2) **Toll- og framleiðslugjøld:**				
2017	Tollgjøld		825.811.742,64	657.000.000,00
2708	Framleiðslugjøld		25.091.233,35	21.000.000,00
2708	Brennioljugjøld (í grunn)		3.556.706,30	0,00
2708	Umskráseting argjald		582.000,00	0,00
			855.041.682,29	678.000.000,00
(§ 3) **Onnur gjøld:**				
3052	Spiritusskamtanarkort		174.969,00	150.000,00
3102	Loyvisgjøld		83.961,00	150.000,00
3204	Arvagjøld		1.749.005,88	1.200.000,00
3256	Lestagjøld		132.452,60	80.000,00
3501	Bøtur		60.400,00	10.000,00
			2.200.788,48	1.590.000,00
(§ 4) **Inntøkur av spæli:**				
4011	Happadrátturin		254.800,00	550.000,00
4058	Burturlutingargjøld		242.327,75	100.000,00
4096	V-4 og totalisatorspæl		613.979,39	450.000,00
			1.111.107,14	1.100.000,00

		Rokningsupph	Fíggjarlógin
(§ 5) Rentur og vinningsbýti v.m.			
5105	Sektarrentur av skatti og pantigjaldi	3.052.388,39	
5105	Sektarrentur av motorgjaldi	164.571,91	
5105	Renta av banka-, sparikassa- og pantpeningi	4.240.641,81	
5105	Rentur av tiltáni v.m.	8.437.418,61	
5105	Rentur av obligationum og partabrøvum	177.859,19	
5105	Rentur av tollkreditti	3.071.630,48	
5105	Rentur viðv. ílagugrunninum	1.475.300,56	
		21.219.810,95	19.000.000,00
	Rentuútreiðslur	: 55.883.299,38	: 65.000.000,00
	Kurstap (§ 24 í fíggjarlógini)	÷43.179.491,57	
		÷77.842.980,00	÷46.000.000,00
(§ 6) Landsstovnar (rakstrarstøð 6014 - 6572):			
6014	Strandfaraskip Landsins	÷49.265.610,93	: 52.000.000,00
6033-6099	Bygdaleiðir	÷17.969.840,97	÷17.000.000,00
6102	Tjaldurs Apotekið	÷ 189.786,46	232.000,00
6204	Telefonverk Føroya Løgtings	14.526.854,00	: 30.281.000,00
6306	Útvarp Føroya	773.838,89	: 4.886.000,00
6311	Sjónvarp Føroya	÷1.292.653,31	. 612.000,00
6358	Postverk Føroya	÷537.725,73	÷1.500.000,00
6408	Oljugoymslur	1.452.728,00	(300.000,00
6567	Hvalasløðun við Áir	÷152.396,97	÷300.000,00
6572	Stórahús við Áir	4.400,00	÷ 45.000,00
		÷52.650.192,38	: 105.095.000,00
(§ 7) Partur av avlopi danska tjóðarbankans samb. lóg:			
7011	Partur av avlopi tjóðarbankans	10.706.819,00	15.000.000,00
(§ 8) Ymsar inntøkur:			
8105	Ymsar inntøkur	391,42	5.000,00
	Samantaldar inntøkur	1.726.739.644,30	1.412.290.000,00

ÚTREIÐSLUR

		Roknskapur	Fíggjarlóg
(§ 10) **Løgtingið:**			
10018	Løgtingsmenn	7.538.908,05	7.274.000,00
10106	Løgtingshúsið	563.883,24	950.000,00
10108	Løgtingsstóðindi og kunngerðarsavn	347.450,75	588.000,00
10301	Ekstern grannskoðan	95.000,00	90.000,00
10403	Intern grannskoðan	1.744.617,72	1.633.000,00
10505	Landsskattanevndin	77.713,92	100.000,00
10607	Norðurlandaráðið	95.659,42	75.000,00
10709	Norrønt samstarv	0,00	75.000,00
		10.463.233,10	10.785.000,00
(§ 11) **Landsfyrisitingin:**			
11015	Løgmaður og landsstýri	2.533.493,58	2.602.000,00
11053	Landsskrivstovan	9.270.399,23	8.350.000,00
11103	Fiskivinnustovan	754.700,43	803.000,00
11155	Uttanríkistænasta í Aberdeen	719.737,99	741.000,00
11205	Uttanríkistænasta í Keypmannahavn	884.917,86	693.000,00
11257	Líkningarráð Føroya, Tórshavn	20.805.563,77	21.862.000,00
11219	Líkningarráð Føroya, Klaksvík	830.931,60	974.000,00
11224	Líkningarráð Føroya, Vági	547.237,50	489.000,00
11276	Dataeftirlit	85.796,12	204.000,00
11307	Manntalsstovan	881.890,85	979.000,00
11359	Almannastovan	7.871.295,03	7.824.000,00
11409	Landsskúlafyrisitingin	9.703.902,38	8.911.000,00
11452	Føroya Gjaldstova, Tórshavn	18.571.448,87	18.521.000,00
11466	Føroya Gjaldstova, Klaksvík	867.402,58	763.000,00
11471	Føroya Gjaldstova, Saltangará	634.706,72	660.000,00
11485	Føroya Gjaldstova, Fuglafjørður	486.013,76	479.000,00
11499	Føroya Gjaldstova, Tvøroyri	580.746,17	629.000,00
11502	Føroya Gjaldstova, Vágur	480.072,03	470.000,00
11516	Føroya Gjaldstova, Sørvágur	371.669,16	430.000,00
11549	Endurgjald til sýslur fyri skrivstovuhald	77.967,25	65.000,00
11554	Tolleftirlitið	4.071.145,55	3.670.000,00
11568	Trygdareftirlitið	366.688,59	322.000,00

		Rokniskapur	Fíggjarlóg
11604	Valuta- og Prísráð Føroya	1.061.980,73	1.046.000,00
11656	Lønarráðið	2.172,31	4.000,00
11661	Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin	774.783,88	830.000,00
11706	Búskaparráð	3.228.766,45	2.927.000,00
11725	Landsbanki	474.354,00	1.250.000,00
11758	Ferða- og dagpeningur	5.652.221,79	3.100.000,00
11808	Innheintingarútreiðslur	83.177,52	80.000,00
11851	Ognin Tinganes	1.728.519,63	1.968.000,00
11901	Landsverkfrøðingurin	10.532.752,27	10.541.000,00
11953	Umsitingarhús í grunn	500.000,00	500.000,00
		105.436.455,60	102.687.000,00

(§ 12) **HEILSUMÁL:**

12109 **Landssjúkrahúsið:**

Rakstrarútreiðslur	184.694.069,44	
: Ríkisstudningur, Landssjúkrahúsið	÷81.324.793,48	
÷ Ríkisstudningur, Psykisk deild	÷ 25.772.000,00	
	77.597.275,96	80.107.000,00

12202 **Klaksvíkar Sjúkrahús:**

Rakstrarútreiðslur	34.581.565,49	
÷ Ríkisstudningur	÷17.375.331,40	
	17.206.234,09	17.224.000,00

12304 **Suðuroyar Sjúkrahús:**

Raskstrarútreiðslur	19.416.961,68	
÷ Ríkisstudningur	÷9.707.083,41	
	9.709.878,27	9.122.000,00

Aftorgoldin rikisstudningur til sjúkrahúsini, rest 1985	1.587.534,70	0,00
12400 Heilsumiðstøðir í grunn	2.000.000,00	2.000.000,00
12508 Læknar	616.742,76	677.000,00
12653 Heimasjúkrasystraskipanin	4.959.620,97	4.056.000,00
12672 Skúlalæknar	124.890,71	160.000,00
12907 Ymiskar útreiðslur:		
Farsóttir	41.515,80	70.000,00
Sjúkrahjálp	7.778,00	0,00
Hvíldarheimið »NAINA«	900.000,00	900.000,00
Vaccinatiónir	0,00	100.000,00
Upplýsing um gitnaðarfyribyrging	350.805,28	100.000,00
Tubbaksráðið	39.349,64	260.000,00
Landsstýrinum at ráða yvir	102.556,01	150.000,00
	115.244.182,19	114.926.000,00

		Rokningar	Fíggjarlóg
(§ 13) **SAMFERÐSLUMÁL:**			
3000-5900	Nýggir vegir og bryr, breiðkan av brúm og umsiting	162.877.258,38	
	÷ endurgjald frá kommunum	: 12.942.000,00	
	: fíggjað úr grunni	÷43.430.567,58	
		106.504.690,80	106.500.000,00
	Játtanir í grunnar:		
13023	Havnagerð	44.000.000,00	41.000.000,00
13037	Lendingar	22.000.000,00	22.000.000,00
13042	Flogferðsla	6.000.000,00	6.000.000,00
13061	Berghols- og brúgvagerð	34.000.000,00	34.000.000,00
13075	Studningur til kommunur til asfaltering	6.000.000,00	6.000.000,00
13227	At rinda IRF	1.211.250,00	1.700.000,00
		219.715.940,80	220.200.000,00
(§ 14) **SKÚLAMÁL:**			
14067	Endurgjald til ritháttvandar	92.000,00	70.000,00
14053	Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið	411.315,56	850.000,00
14103	**Fólkaskúlin:**		
	Lærararønir 128.539.333,20		
	Lærarafterlønir 8.825.808,00		
	Skúlabarnaflutningur 2.380.252,10		
	Ymiskt 100% statsks. 1.610.063,49		
	÷ endurgj. f. ríkiskass ÷80.525.163,19		
	÷ endurgj. f. komm. 0,00	60.830.294,40	54.129.000,00
14155	HF-skeiðið í Suðuroy	3.306.624,17	3.049.000,00
14169	HF-skeiðið í Klaksvík	2.633.936,36	2.222.000,00
14174	Studenta- og HF-skeiðið, Gøta	9.888.810,20	9.709.000,00
14205	Studenta- og HF-skeiðið, Tórshavn	16.922.216,53	16.462.000,00
14257	Kostdeild Studentaskúlans	2.200.055,19	2.317.000,00
14307	Føroya Sjómansskúli	5.256.363,52	5.263.000,00
14409	Klaksvíkar Sjómansskúli	2.274.245,79	1.856.000,00
14414	Føroya Maskinskúli	465.000,00	650.000,00
14502	Føroya Fólkahúskúli	2.290.600,00	2.335.000,00
14554	Húsarhaldsskúlar	480.000,00	735.000,00
14656	Landsmiðstøð fyri undirvísingarambo	0,00	1.559.000,00
14604	Fritíðarundirvísing	1.635.883,93	2.382.000,00
14618	Studningur til musikskúlar	2.971.833,34	2.941.000,00
14901	**Ítróttur:**		
	Lánigrunnur til ítróttaranlegg	100.000,00	100.000,00
	Studningur til ÍSF	1.800.000,00	1.800.000,00
	Studningur til ferðir umanoyggja	1.492.401,00	600.000,00

		Rokinskapur	Fíggjarlóg
14953	**Ymiskir studningar:**		
	Grunnur til útbúgving	8.000.000,00	8.000.000,00
	Grunnur til lærlingar	200.000,00	200.000,00
	Landbúnaðarnæmingar	5.000,00	40.000,00
	Ymisk framhaldsundirvísing	15.000,00	15.000,00
	Skúlabarnaferðir, uttanlands	64.660,00	65.000,00
	Skúlabarnaferðir, innanoyggja	361.368,00	450.000,00
	Íbróttar- og skúlabyggigrunnur	16.000.000,00	16.000.000,00
	Sjómansskúli í grunn	500.000,00	500.000,00
	Studentaskúlin í Hoydølum í grunn	500.000,00	500.000,00
	Næmingastudningur til listarnenn	60.998,00	35.000,00
	Meginfelag føroyskra studenta	130.000,00	130.000,00
	Norrøna Felagið	160.000,00	160.000,00
	Studn. til fremmand, ið lesa í Føroyum	25.000,00	25.000,00
	Landsskúlayrisitingin at ráða yvir	3.000,00	60.000,00
	Eftirútbúgving av handverkarum	311.978,12	600.000,00
	Ungmannafeløgini ULF og UF	330.000,00	330.000,00
	Eftirútbúgving av sjómonnum	28.176,12	100.000,00
	Tekniski skúlin í Klaksvík	300.000,00	300.000,00
	Landsstýrinum at ráða yvir	275.500,00	275.000,00
		142.322.260,23	136.814.000,00

(§ 15)	**VÍSIND, BÓKMENTIR OG LIST:**		
15109	Føroya Landsbókasavn	3.748.534,42	3.753.000,00
15202	Fólkabókasøvn	3.550.695,91	6.192.000,00
15304	Landsskjalasavn	2.033.205,34	1.689.000,00
15406	Føroya Fornminnissavn	4.663.468,33	4.944.000,00
15508	Bygdasøvn	491.953,76	515.000,00
15551	Fiskirannsóknarstovan	12.847.421,35	13.476.000,00
15653	Fuglakanningarstøð	20.000,00	20.000,00
15703	Føroya Náttúrugripasavn	1.784.205,20	1.733.000,00
15717	Danmarks Geolog. Undersøgelse	350.792,40	450.000,00
15755	Fróðskaparsetur Føroya	6.998.202,47	7.388.000,00
15793	Stovnar á Debesartrøð	1.197.967,07	1.343.000,00
15805	Heilsufrøðiliga Starvsstova	3.623.516,47	3.638.000,00
15857	Náttúrufriðingarnevndin	252.449,68	200.000,00
15895	Tónleikur og sangur	510.877,00	500.000,00
15907	**Ymiskir studningar:**		
	Barnablað	61.500,00	45.000,00
	Sjónleikur	350.000,00	350.000,00
	Til útgávu av barnabókum	900.000,00	900.000,00
	Sømdarpeningur til skald og listafólk	135.000,00	135.000,00
	Lánigrunnur til bókaútgávu	100.000,00	100.000,00

	Rokningur	Fíggjarlóg
Skúlabókaútgáva	2.100.000,00	2.100.000,00
Norðurlandahús, í grunn	654.670,00	532.000,00
Sjónleikarhús, í grunn	100.000,00	100.000,00
Fornminnissavn, í grunn	650.000,00	650.000,00
Útvarpssendistøðir, í grunn	1.000.000,00	1.000.000,00
Bókamiðsølan, rakstur	300.000,00	300.000,00
Orðabókaútgáva, í grunn	200.000,00	200.000,00
Ungdóms- og bygdahús, í grunn	1.000.000,00	1.000.000,00
Mentunargrunnurin	950.000,00	950.000,00
Føroya Listasavn v.m.	360.000,00	360.000,00
Savn í Hoyvík, í grunn	100.000,00	100.000,00
Føroysk-Íslendskt samstarv	50.174,00	100.000,00
Fiskirannsóknarstova, í grunn	2.000.000,00	2.000.000,00
Skjalasavn, í grunn	300.000,00	300.000,00
Málstovan	202.622,56	200.000,00
Útvarp Føroya	2.500.000,00	2.500.000,00
Kirkjubømúrurin, í grunn	1.047.790,22	1.000.000,00
Sjónvarp Føroya	621.000,00	621.000,00
Sjónvarp, í grunn	3.000.000,00	3.000.000,00
Landsstýrinum at ráða yvir	313.628,00	300.000,00
	61.069.674,18	64.684.000,00

(§ 16) **FISKIVINNA, SIGLING o.t.:**

16018	Vrakarastovnurin	2.175.061,13	2.186.000,00
16106	Nautiskt Royndarkamar	16.621,20	27.000,00
16208	Sjómansheim	265.500,00	451.000,00
Spurningurin um, hvat nú er til ráða at taka, er ein landspolitiskur spurningur, ti skúlin er nú so langt niðurkoyrdur, at hann illa kann koma longur niður. Bert nøkur fá orð um hetta: Sum landsstýrinum kunnugt, vórðu allir danskir maskinmeistaraskúlar fyri nakað síðani fluttir frá undirvísingarmálaráðnum til industrimálaráðið; og var hetta m.a. ein orsøk til, at tann ætlaða bygging av maskinskúlanum, sum eisini var góðkend av landsskúlafyrisitingini og landsstýrinum, datt púra burturímillum, tá handilsskúlin og tekniski skúlin fingu tillutað ein part av byggipeninginum til teirra nýggju skúlar. Maskinskúlin fekk einki, og neyvan man nakar innan hesa skúlagátt ella innan landsskúlafyrisiting vænta, at staturin byggir skúla til okkara. Tí frá »maskinmesteruddannelsen« hava vit fingið at vita, bæði beinleiðis og eisini óbeinleiðis gjøgnum landsskúlafyrisitingina, at tað hvørki eru nakrir pengar at byggja fyri nú, og heldur ikki er nakað avsett á figgjarlógini at byggja fyri, og at vit kunnu ikki rokna við, at nakrir pengar verða avsettir til bygging í árunum framyvir. Men tað, sum slær seymin á høvdið eru úttalilsir frá industrimálaráðnum til umboð frá landsskúlafyrisitingini, sum vóru niðri fyri at royna at fáa gongd á tað uppsteðgaða byggimálið. Har varð sagt soleiðis, at eftir teirra meting (maskinmesteruddannelsen) høvdu føroyingar ikki tørv á at fáa viðkað maskinmeisturaskeið, og at vit høvdu tað nóg rúmligt sum er. Hetta var so teirra niðurstøða, og so kunn ein og hvør síggja framtíðarvónirnar, um hann vil.

Skúlin hevur sum kunnugt vaksandi næmingatilgongd (beint nú eru 50

meningar innmeldaðir til maskinistskeiðið í august, men samstundis verða fyri fyrstu ferð noktaðir at taka 2 parallellflokkar inn. »Maskinmesteruddannelsen« vil bert loyva einum flokki at vera uppi tikin.

Um eg sum stjóri fyri Føroya Maskinskúli skal siga, hvat eg haldi vera bestu loysn, so er hon henda: Lat okkum byggja og gjalda fyri byggingini sjálvir, og um landsins myndugleikar halda, at maskinskúlin hevur eina týdningarmikla uppgávu at rokja, so er eingin tíð út at geva.

Um vit byggdu skúlan nú (grundstykki eiga vit síðuna av handilsskúlanum), so vórðu høllistrupulleikarnir, sum eru nevndir fyrr í hesum skrivi, sumstundis loystir, og skal eg eisini loyva mær at nevna, at tað er ein ómetaliga stórur fyrimunur at kunna hava laboratoriini í sama bygningi, tí tey verða so nógv nýtt, og serliga til tað víðkaða skeiðið. At leiga eitt stórt høli separat til el-laboratorium, sum møguliga kemur at liggja langt burtur frá skúlanum, ja tað er jú ein loysn, men í royndd og veru ein fyribilsloysn og heldur ikki besta loysnin. Hon er ópraktisk, kostnaðarmikil og kann koma til at seinka teirri ætlaðu byggingini.

Hetta er ikki beinleiðis nøkur umsókn, men eg haldi meg her hava í høvuðsheitum greitt frá støðuni, soleiðis, sum hon er í dag. Men um hesar upplýsingar kundu verið við til at bøtt um korini hjá maskinskúlanum á tann hátt, at landsstýrið sá tað sum sína uppgávu at fara í holt við, so vildu vit verið hjartans fegnir um tað. Hvørja loysn landsstýrið so kemur til, tað eru vit spentir at fretta um, men eg vil einaferð enn mæla til at velja tað bestu loysnina: at byggja ein nýggjan skúla sum skjótast.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er at játta kr. 2.420.000,- til víðkaða maskinmeistarprógvið.

7. J. nr. 9-99-11 R. Uppskot um útbúgving til landmátarateknikkara.
Landsskúlaráðið samtykti einmælt at mæla Føroya Landsstýri til at góðkenna, at farið verður undir útbúgving til landmátarateknikkara, so sum skotið er upp í uppriti frá Landsskúlafyrisitingini 8. juli 1986.

8. J. nr. 99-40-29-01. Uppskot um broyting í skúlaætlanini fyri Mikladals-Trøllanes skúla
Landsskúlaráðið samtykti einmælt — treytað av góðkenning bygdaráðsins — at góðkenna, at skúlaætlanin fyri Mikladals/Trøllanes Skúla verður broytt við gildi frá komandi skúlaári soleiðis, at bæði born úr Miladali og av Trøllanesi verða koyrd bygdanna millum, so at tey kunnu fáa dagliga undirvising aðrahvørja viku í hvørji bygdini. Tó kunnu born í 1. og 2. árgangi framvegis verða undirvíst aðrahvørja viku í heimbygdini, um foreldrini ynskja tað.

9. J. nr. 0-0-2. Frágreiðing frá Landsskúlastjóranum.
Frágreiðingin, dagfest 15. juli 1986, var lisin upp og tikin til eftirtektar.

7. J. nr. 9-99-11 R. Uppskot um útbúgving til landmátarateknikkara.
Landsskúlaráðið samtykti einmælt at mæla Føroya Landsstýri til at góðkenna, at farið verður undir útbúgving til landmátarateknikkara, sosum skotið er upp í uppriti frá landsskúlafyrisitingini 8. juli 1986.

8. J. nr. 99-10-29-01. Uppskot um broyting í skúlaætlanini fyri Mikladals Trøllanes Skúla.
Landsskúlaráðið samtykti einmælt — treytað av góðkenning bygdaráðsins — at góðkenna, at skúlaætlanin fyri Mikladals Trøllanes Skúla verður broytt við gildi frá komandi skúlaári soleiðis, at bæði børn úr Mikladali og av Trøllanesi verða koyrd bygdanna millum, so tey kunnu fáa dagliga undirvísing aðrahvørja viku í hvørji bygdini. Tó kunnu børn í 1. og 2. árgangi framvegis verða undirvíst aðrahvørja viku í heimbygdini, um foreldrini ynskja tað.

9. J. nr. 0-11-2. Frágreiðing frá landsskúlastjóranum.
Frágreiðing, dagfest 15. juli 1986, var lisin upp og tikin til eftirtektar.

Uppskot til landsskúlaráðið
Fylgiskjal til fíggjarlógaruppskot fyri 1987
Í samband við stovnsetan av Føroya Yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað

Stutt frágreiðing um málið:

1) Í 1982 á Jóansøku setti landsskúlastjórin, sum tá var Ludvig Petersen, eina nevnd, sum skuldi gera uppskot til útbúgvingar í fiskivinnu.
2) 15. september 1983 var nevndin liðug við einum álíti, sum inniheldur eitt gjølla uppskot til eina FISKIÍDNAÐARÚTBÚGVING. Uppskotið fevnir bæði um: Endamál, upptøkutreytir, bygnaðar, skeiðvirksemi, tíma- og lærugreinabýti 1. og 2. árið, yrkisástøði- og starvslæra, eftirmeting, yrkisroynd, yrkisprógv, yrkisbrøv, høli og útgerð og stýring og lærarar.
3) Álitið varð margfaldað í 200 eintøkum, sum vórðu send út til øll, sum kundu hugsast at hava áhuga fyri hesa útbúgving við einum fylgiskrivi, har ið tey vórðu biðin um at koma við viðmerkingum. Tær viðmerkingar, sum komu, eru tiknar til eftirtektar.
4) Álitið varð sent landsstýrinum beinan vegin, og Eilif Samuelsen, sum var landsstýrismaður í skúlamálum tá, greiddi løgtinginum frá í oktober 1983.
5) Á fundi 21. juni 1985 varð álitið lagt fyri landsskúlaráðið, sum einmælt samtykti at biðja Landsskúlafyrisitingina halda fram við arbeiðinum við støði í álitinum hesum viðvíkjandi.
6) Á fundi í Landsskúlaráðnum 15. oktober 1985 varð uppskot til LØGTINGSLÓG UM FØROYA YRKISSKÚLA FYRI FISKIÍDNAÐ OG HAVBÚNAÐ SAMTYKT.
7) Í november 1985 kom álitið um MIÐNÁMNSÚTBÚGVINGAR. Álitið um fiskiídnaðog havbúnaðarútbúgving er sostatt liðið við í hesum heildarálitinum, og eisini er útbúgvingin gjørd í samsvar við einari hugsan um eina heildarmynd av miðnámsútbúgvingunum í Føroyum.

Fylgiskjal til fíggjarlógaruppskot fyri 1987:
Málið er stovnsetan av útbúgving Í FISKIÍDNAÐI OG HAVBÚNAÐI átti sostatt at verið greitt. Hetta er ein útbúgving, sum vinnan hevur tørv á. Hon er ikki til í Føroyum. Vit senda ung fólk av landinum fyri at fáa útbúgving á hesum økjum.

Landsskúlafyrisitingin er av teirri áskoðan, at ikki er neyðugt at bíða við at seta hesa útbúgving á stovn, og vil hon tí við hesum mæla Landsskúlaráðnum at heita á Landsstýrið um at henda útbúgving verður sett á stovn frá august 87

Um útbúgvingin skal byrja í august 1987 er neyðugt, at ein ávís upphædd verður sett á figgjarlógina fyri 1987.

Her verður eitt uppskot til kostnað sett upp, sum Landsskúlaráðið verður biðið um at tilmæla:

Hetta uppskot er gjørt á ódýrasta hátt, út frá hesum forreytum, sum tó eru í samsvar við lógaruppskotið og álitið:

1) Útbúgvingin byrjar á **einum** plássi í verandi hølum, sum verða leigað.

2) Byrjað verður við 1 flokki — 20 - 24 næmingum. (Til tað starvsliga verða teir býttir sundur í bólkar, men ganga saman til tær ástøðiligu lærugreinirnar).

Tørvur: (Útbúgvingin er 2 ár á skúla): 2-3 rúm til ástøðiliga undirvising við 20 - 24 næmingum + nøkur smærri rúm til bólkaarbeiði o.a. Haraftrat krevst ein starvsstova við ymiskum tólum og amboðum.

3) Í góðari tíð áðrenn útbúgvingin byrjar (t.d. í byrjanini av 1987) verður ein skúlastjóri settur, sum eigur at fyrireika útbúgvingina. T.d. skal hann gera avtalur við verandi virki um upplæringina á tí starvsliga økinum.

4 Lærarar til tær ástøðiligu lærugreinirnar verða nýtti frá øðrum skúlum, um ikki fult tímatal kann fáast í byrjanini.

Kostnaður fyrsta árið (meting):

Lønir: umleið 60.000 kr. mðr.	720.000 kr.
aðrar útreiðslur;	
Leiga, el, hiti, vask, ferða- og dagpeningur, trygging, prentlutir, telefon, postgjald, skrivstovuútreiðslur o.a.:	280.000 kr.
Rakstur tilsamans:	1.000.000 kr./ár.
Keyp av útgerð:	500.000 kr.

Hetta er fyri tað 1. skúlaárið. Um skúlin skal byrja 1. august 1987 verður neyðugt við hesari játtan í hesum figgjarlógaruppskoti:

Løn til skúlastjóra frá 1. januar 1987 - 31. desember 1987:	230.000 kr.
útgerð	500.000 kr.
Rakstur og lønir (-stjóran) 5/12 av 770.000	321.000 kr.
(1. august 1987 - 31. desember 1987) tilsamans	1.051.000 kr.

Tey fyrstu 2 árini verður bert 1 flokkur í skúla um árið. 3. árið verða 2 flokkar: tí tá koma næmingarnir frá 1. árinum aftur, aftaná at hava verið í praktikk í 1 ár fyri at taka 2. skúlaár.

Landsskúlafyrisitingin fer við hesum at heita á Landsskúlaráðið um at mæla landsstýrinum til at seta nevndu upphæddd á fíggjarlógina fyri 1987.

Upprit í sambandi við stovnsetan á sjóvinnuskúla í Føroyum.

Fylgiskjal til fíggjarlógaruppskot 1987.
Av tí at málið um stovnsetan av sjóvinnuskúla í Føroyum er komið so mikið ávegis, at uppskot um broyting í løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984 umframt uppskot til kunngerð um sjóvinnuskúla og uppskot til kunngerð um yrkisútbúgving innan sjóvinnu verður lagt fyri Landsskúlaráðið í heyst, at Landsskúlafyrisitingin av teirri áskoðan, at um skúlin skal byrja á sumri 1987, so er neyðugt við ávísari upphæddd á fíggjarlógini 1987.

Um gingið verður út frá, at skúlin kann byrja í verandi høltum, og at bert útreiðslur til rakstur og keyp av útgerð verður tikið við, og at skúlin í fyrstani er ætlaður at hýsa 60 næmingum árliga, fer ein fyribils kostnaðarætlan at siggja soleiðis út:

Lønir:	1.510.709 kr.
El, hiti og vask	100.000 kr.
Umsiting	80.000 kr.
Tryggingar	25.000 kr.
Innbúgv	25.000 kr.
Telefon o.a.	20.000 kr.
Amboð	50.000 kr.
Eldsløkking	176.000 kr.
Aðrar útreiðslur	50.000 kr.
Ferðing innanlands	20.000 kr.
Skrivstovuútreiðslur	50.000 kr.
Rakstrar útreiðslur tilsamans	2.097.709 kr.
Keyp av amboðum og útgerð	1.200.000 kr.
Tilsamans	3.300.000 kr.

Um skúlin skal byrja í august 1987 verður neyðugt við hesari játtan í hesum fíggjarlógaruppskoti:

Rakstur 1/8 - 31/12-87:	874.045 kr.
Keyp av amboðum og útgerð	1.200.000 kr.
Tilsamans	2.074.045 kr.

Landsskúlafyrisitingin fer við hesum at heita á Landsskúlaráðið um at mæla landsstýrinum til at nevnda upphædd verður avsett í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1987.

Uppskot til fíggjarlóg 1987 »Eftirútbúgving av sjómonnum«.

Rakstrarstað 14953, konto 313471.

Eftirútbúging av sjómonnum fevnir um tey skeið, sum eru obligatorisk sambært STCW samtyktina umframt onnur skeið innan tólviðgerð.

Í fyrra hálvári 1986 eru hesi skeið hildin:

1. Trygd í kemikaliskipum
2. Trygd í gasstangaskipum
3. Skeið í loran C og videoplottara.

Skeiðini eru hildin á Føroya Sjómansskúla og Klaksvíkar Sjómansskúla fyriskipað av Landsskúlafyrisitingini.

Seinna hálvár 1986 verða fleiri onnur skeið tikin við sum til dømis: Skeið í radarnýtslu og ARPA flutningur av vandamiklum farmi umframt framhald av teimum fyrrnevndu.

Mælt verður til at upphæddin fyri 1987 verður sett til . . . . . 110.000 kr.

Upprit til Landsskúlaráðið

Landsskúlafyrisitingin arbeiðir í løtuni í samstarvi við Føroya Teknikarafelag við stovnsetan av framhaldandi teknikaraútbúgving.

Talan er um útbúgving til **landmátarateknikara**, og er hetta ein útbúgving, ið Føroya Teknikarafelag ígjøgnum longri tíð hevur heitt á Landsskúlafyrisitingina at skipa fyri. Í august 1985 setti Landsskúlafyrisitingin eina nevnd at arbeiða víðari við málinum.

Arbeiðið við at skipa fyri hesi útbúgving er komið nettiliga væl áleiðis, og hevur nevndin gjørt uppskot til lærugreina- og tímabýti (sí hjálagt uppskot til útbúgving). Tað, ið vantar, er ein kunngerð og nágreiniligari lýsingar fyri tær einstøku lærugreinirnar.

Endamálið við at skipa fyri hesari útbúging er at geva teimum teknikarum, ið starvast innan hetta øki ein førleika, ið kann nýtast aðrastaðni enn á tí stovni, ið viðkomandi er upplærdur á, og mælir Landsskúlafyrisitingin Landsskúlaráðnum til at samtykkja, at farið verður undir hesa útbúging út frá tí sjónarmiði, at arbeiðsførleiki skal kunna takast við sær í annað starv á øðrum stovni.

Ætlanin er at skipa útbúgvingina í skeiðum yvir tvey ár, eins og tað sæst á hjálagda uppskoti.

Útbúgvingin er ætlað at fara fram á Tekniska Skúla í Tórshavn, har hølir og tekniskur útbúnaður er tøkur. Í teimum førum har kompetentir lærarar vanta, fer Landsskúlafyrisitinin at heita á Tekniska Skúla í Horsens. Umframt tann útbúnaðin, ið er tøkur á skúlanum, verður neyðugt at leiga sertól.

Landsskúlafyrisitin hevur kannað næmingagrundarlagið, og vísir tað seg, at nógvir bæði privatir og almennir stovnar hava áhuga fyri hesum tiltaki. Upptøkukravið verður annaðhvørt útbúgving sum tekniskur assistentur, tekniskur teknari ella læru/starvstíð, ið skal verða góðkend av Landsskúlafyrisitingini.

Kostnaðurin verður mettur til uml. kr. 200.000,00 t.v.s. uml. kr. 100.000,00 um árið.

Leggjast kann aftur at, at henda útbúgving verður ikki framd á hvørjum ári, men farið kann verða undir hana aftur, tá ið tørvur er á ti.

Fylgiskjal til fíggjarlógaruppskot 1987.
Vísandi til samtykt Landsskúlaráðsins 15. juli 1986 um at farið verður undir at skipa fyri landmátarateknikaraútbúgving, verður niðanfyristandandi at leggja sum fylgiskjal til fíggjarlógaruppskot LSF's fyri 1987.

Mett verður í hjálagda uppriti til Landsskúlaráðið, at útbúgvingin kemur at kosta uml. 200.000 kr., t.m. uml. 100.00 um árið.

Kostnaðaretlanin sær soleiðis út fyri 1987 og 1988:

Lønir uml.	70.000 kr.
Útgerð uml.	50.000 kr.
Ferða- og uppihaldsútreiðslur til ferðalærarar uml.	20.000 kr.
Leigu- og aðrar útreiðslur	60.000 kr.
tilsamans uml.	200.000 kr.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er at játta 100.000,- kr.

Ad § 14 — 1490I/313128 Íróttarsamband Foroya
Sbrt. skriv dagf. 5. juni 1986.

Hjálagt senda vit fíggjaruetlan fyri Í.S.F. fyri árið 1987,
sum vísir ein stundnigstørv uppá ..... 2.926.000,00 kr.

Vónandi verður tikið væl undir við hesum uppskoti hjá okkum, men eru ivaspurningar, eru vit altíð fúsir at samráðast um hetta.

FÍGGJARÆTLAN FYRI Í.S.F. — 1987.

Inntøkur:

Landskasastudningur	2.926.000 kr.
Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya	100.000 kr.
Limagjald til Í.S.F.	85.000 kr.
Fótbóltssamband Føroya	485.000 kr.
Hondbóltssamband Føroya	203.000 kr.
Róðrarsamband Føroya	15.000 kr.
Flogbóltssamband Føroya	208.000 kr.
Badmintonsamband Føroya	000 kr.
Borðtennissamband Føroya	6.000 kr.
Svimjisamband Føroya	45.000 kr.
Føroya Fimleikasamband	000 kr.
Ítróttarsamband fyri Brekað	000 kr.
Judosamband Føroya	8.000 kr.
Ungdóms og menningardeildin	000 kr.
Inntøkur tilsamans	4.081.000 kr.

Útreiðslur:

Felagsrakstur	920.000 kr.
Fótbóltssamband Føroya	885.000 kr.
Hondbóltssamband Føroya	625.000 kr.
Róðrarsamband Føroya	135.000 kr.
Flogbóltssamband Føroya	736.000 kr.
Badmintonssamband Føroya	128.000 kr.
Borðtennissamband Føroya	124.000 kr.
Svimjisamband Føroya	202.000 kr.
Føroya Fimleikasamband	102.000 kr.
Ítróttarsamband fyri Brekað	134.000 kr.
Judosamband Føroya	60.000 kr.
Ungdóms og menningardeildin	30.000 kr.
Útreiðslur tilsamans	4.081.000 kr.

Felagsrakstur:

Ferðing, koyring og umbodan	50.000 kr.
Innivist og kostur	50.000 kr.
Búnar og amboð	15.000 kr.
Gávur og gravering	30.000 kr.
El og hiti	45.000 kr.
Umsiting — Hús	30.000 kr.
Trygging	10.000 kr.
Reingerðing og vask	40.000 kr.
Vaktarhald	12.000 kr.
Skrivstovuhald	100.000 kr.
Postgjald	40.000 kr.
Lýsing, telefon og telex	70.000 kr.
Pappír og prentan	90.000 kr.
Bókhald og grannskoðan	40.000 kr.
Rentuútreiðslur	15.000 kr.
Aðrar útreiðslur	20.000 kr.
Rentur og avdráttur av lánum	263.000 kr.
	920.000 kr.

Fíggjarætlan fyri 1987:

Inntøkur:

Ísafjarðasúlukappingin	95.000 kr.
Landsdystir	85.000 kr.
Lima- og luttøkugjøld	60.000 kr.
Limagjøld og dómardeildina	30.000 kr.
Kappingarskipanin	70.000 kr.
Stuðlar	110.000 kr.
Gjøld til venjaradeildina	15.000 kr.
Ymiskar	20.000 kr.
	485.000 kr.

Útreiðslur:

Lýsingar og telefon	10.000 kr.
Ferðaútreiðslur (innanoyggjar)	50.000 kr.
Innivist, kostur oa.	90.000 kr.
Búnar og amboð	50.000 kr.
Prentlutir	15.000 kr.
Gávur, nálir og merkir	35.000 kr.

Framhald

Skrivstovuútreiðslur	15.000 kr.
Skrivstovufólk løn	75.000 kr.
Reingerð (búnur v.m.)	10.000 kr.
Venjarar	90.000 kr.
Útbúgving av venjarum og dómarum	75.000 kr.
Kappingarskipanin	35.000 kr.
Ísafjarðarsúlukuppingin	35.000 kr.
Norðurlanda- og alheimssamarbeiði	90.000 kr.
Landsdystir	210.000 kr.
	885.000 kr.

Hondbólssamband Føroya (H.S.F.)
Uppskot til fíggjarætlan fyri 1987

Inntøkur:	Luttøkugjald	28.000 kr.
	Inntøkur av landsliðunum	100.000 kr.
	Kappingarskipanin	66.000 kr.
	Venjara- og dómaraskeið	9.000 kr.
		203.000 kr.

Útreiðslur:

Lýsingar og telefon	7.000 kr.
Pappír og prentan	11.000 kr.
Gávur og graverıng	18.000 kr.
Vask av klæðum	12.000 kr.
Limagjald Alheimsflg.	8.000 kr.
Útreiðslur av kappingarskipan	22.000 kr.
Bókhald	3.000 kr.
Grannskoðan	4.000 kr.
Landsliðsurbeiði	500.000 kr.
Skeið	40.000 kr.
	625.000 kr.

Hall at fíggja 422.000 kr.

Figgjarætlan R.S.F's fyri árini 1987/1988 og 1989.

Kappingarútreiðslur	45.000 kr.	
Heiðursmerkir o.a.	20.000 kr.	
Pappír og prentan	10.000 kr.	
Skrivstovuútreiðslur	10.000 kr.	
Ferðaútreiðslur	10.000 kr.	
Dómaraskeið og onnur skeið	20.000 kr.	
Fundarútreiðslur	15.000 kr.	
Ymiskar útreiðslur	5.000 kr.	
Luttøkugjald		10.000 kr.
Kappingarskipanin		5.000 kr.
Landskassastudningur		120.000 kr.
	135.000 kr.	135.000 kr.

Henda figgjarætlan er gjørd í 1986-krónum, og er ikki tikin hædd fyri, um møguliga annað norðurlendskt samarbeiði verður tikið upp.

Fyrivarni verður eisini tikið viðvíkjandi kappingarútreiðslunum í sambandi við, at nýggj tól vm. verða keypt til kappróðurin.

Flogbóltssamband Føroya (F.B.F.)
Figgjarætlan 1987

Inntøkur

1: Kappingarinntøkur:	Pressudystir Landsdystir (Ungl	10.000 kr.
2: Luttøkugjøld:	FM - Y	
	FM - Vaksin	45.000 kr.
	Steypakapping - Yngri	
	Steypakapping - Eldri	
3: Lýsingar á spælibúnum:	Sponsorar	30.000 kr.
	Godkenning	2.000 kr.
4: Sponsorar til steyp		6.000 kr.
5: Skeiðvirksemi		25.000 kr.
6: Luttakaragjald á ferðum:		40.000 kr.
7: Lýsingar í blaðnum og í landsdystaskrá		50.000 kr.
tilsamans:		208.000 kr.

Útreiðslur

1: Lýsingar	8.000 kr.
2: Ferðaútreiðslur innanlands	53.500 kr.
3: Ferðaútreiðslur uttanlands	341.000 kr.
4: Innivist og kostur innanlanda	37.000 kr.
5: Innivist og kostur uttanlands	68.000 kr.
6: Búnar, ambað og annað	15.000 kr.
7: Pappír, prent., blað, bøkur o.t.	27.000 kr.
8: Gávur og gravering	10.000 kr.
9: Samsýningar, mist, arb. løn	32.000 kr.
10: Skrivstovuútreiðslur	5.000 kr.
11: Leiga av høllum	116.000 kr.
12: Skeiðvirksemi (sí annað konti)	0 kr.
13: Limagjøld til alheimssamgongur	9.000 kr.
14: Nálir, vimplar, merkir, medaljur, steyp o.t.	15.000 kr.
tilsamans	736.500 kr.

Fíggjarætlan fyri Badmintonsamband Føroya

Hallarleiga	20.000 kr.
Bóltar	10.000 kr.
Heiðurstekin og graveringar	10.000 kr.
Skeið	7.000 kr.
Limagjøld	6.500 kr.
Fyrisitingarútreiðslur	2.000 kr.
Landsdystir í Íslandi	30.000 kr.
Vitjan frá D.A.I.	8.000 kr.
Landsstævne í Odense 27.-30. juni 85	25.000 kr.
Aðrar útreiðslur	10.000 kr.
Tilsamans	128.500 kr.

Borðtennissamband Føroya

(B.T.S.F.)

Uppskot til figgjarætlan

Inntøkur:

o1: Luttøkugjald	6.000 kr.
o2: Landsskassastuðningur	118.000 kr.
Inntøkur tilsamans	124.000 kr.

Útreiðslur:

03: Ferðaútreiðslur	50.000 kr.
04: Innivist vm.	20.000 kr.
05: Pappír og prentan	5.000 kr.
06: Gávur og graveringar	8.000 kr.
07: Lønir og venjarar	12.000 kr.
08: Leigan av hølum	10.000 kr.
09: Lýsingar	4.000 kr.
10: Limagjald til útland	5.000 kr.
11: Ymisk útgerð (Búnar og annað)	10.000 kr.
Útreiðslur tilsamans	124.000 kr.

Figgjarætlan hjá Svimjlsambandinum

Inntøkur:

Stuðul við inns. o.ø.	30.000 kr.
Luttøkugjald FM og SUM	5.000 kr.
Atgongugjald	10.000 kr.
Inntøkur tilsamans	45.000 kr.

Útreiðslur:

Lattuka uffanlands	120.000 kr.
Limagjald NSF, LEN og FINA	8.000 kr.
Gávur	3.000 kr.
Landsliðsvenjing	10.000 kr.
Skrivstovuumboð	5.000 kr.
Uttanlandsumboðan NSF, LEN	15.000 kr.
FM og SUM útreiðslur	5.000 kr.
Vinningar til FM og SUM	11.000 kr.
Diplomir o.a.	5.000 kr.
Skeiðvirksemi í felǿgunum	15.000 kr.
Prent og lýsing	5.000 kr.
Útreiðslur tilsamans	202.000 kr.

Sostatt vísir fíggjarætlanin eitt hall uppá 157.000 kr.

Fíggjarætlan fyri F.E.S.
Inntøkur:

Studningstørvur frá Í.S.Í.	102.000 kr.

Útreiðslur:

Ferðir og køyring	20.000 kr.
Uppihald	5.000 kr.
Búnar og amboð	4.000 kr.
Venjaralæn	15.000 kr.
Dómarar	3.000 kr.
Gávur	3.000 kr.
Skrivstovuútreiðslur	1.000 kr.
Pappír og prentan	3.000 kr.
Bókhald og grannskoðan	2.000 kr.
Lýsingar og telefon	2.000 kr.
Aðrar útreiðslur	2.000 kr.
Leiga av høli	7.000 kr.
P.R.	7.000 kr.
F.I.G.	8.000 kr.
N.G.F. í uddannelseskomit'e	20.000 kr.
	102.000 kr.

Ítróttarsamband fyri brekað

fíggjarætlan

Skrivstovuhald í prenting í lýsingar ca.	5.000 kr.
Frálæringartilfar (bóltar o.t.) ca	10.000 kr.
Skeið í Føroyum	10.000 kr.
Skeið í norðanlondum	20.000 kr.
Kappingar í Føroyum	3.000 kr.
Haldaragjald	6.000 kr.
Kappingar í útlondum	80.000 kr.
	134.000 kr.

Judosamband Føroya
Fíggjarætlan
Inntøkur:

Atgongumerkjagjald	4.500 kr.
Luttøkugjald	2.500 kr.
Graduéringsgjald	1.100 kr.
	8.100 kr.

Útreiðslur:

Lýsingur og telefon	2.000 kr.
Ferðaútreiðslur	7.000 kr.
Innivist og kostur	7.100 kr.
Bílnar og amboð	7.700 kr.
Pappír og prentan	2.500 kr.
Gávur og gravering	1.800 kr.
Venjarar tg dómarar	3.000 kr.
Leiga av hølum	9.000 kr.
Umboðan uttanlands	15.000 kr.
Aðrar útreiðslur	1.900 kr.
	60.000 kr.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Landsstýrið hevur samtykt at veita Í.S.F. kr. 2.200.000 kr.

Ad § 14 — 14953/313351 Listafelag Føroya (næmingastuðn.)

Skrt. skriv dagfest 3. juni 1986:

Kontonr og navn	Rokn.sk. 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppsk. 1987	Uppsk. landsst. 1987
Næmingastuðningur		35.000	45.000	45.000
— til listamenn				

Tórshavn 3. juni 1986.

Hvørt ár eru millum 6 og 8 umsøkjarar, sum átta at fingið ein dugnað summir byrja eina listarliga útbúgving, meðan aðrir halda á við at búgva seg út.

So tí at peningavirði støðugt lekkar, heldur felagið, at árliga menningaveitingin. »Næmingastuðningur til listamenn« átti at verið sett til kr. 45.000,- kr.

Fyri Listafelag Føroya
Janus Kamban

Ad § 14 — 14953/313384 Norrøna Felagið

Hervið verður sent uppskot til fíggjarløgtingslógina 1987 fyri Norrøna Felagið í Føroyum, rakstrarstað 14953/313384.

Søkt verður um somu upphædd sum fíggjarárið 1986, ... 160.000 kr.

Í aðrar mátar loyva vit okkum at vísa til viðmerkingar okkara undanfarnu ár.

Hjálagdur er okkara seinasti roknskapur, grannskoðaður.

Viðmerkingar landsstýrisins:

Landsstýrið hevur samtykt at játtaðar verða . . . . . 160.000 kr.

Ad § 14 — 1495/313455 Landsfelag Foroyinga i uthigving

Sbrt. skriv dagfest 15. juni 1986:

Viðvíkjandi løgtingsfiggjarlógini fyri 1987.

Í sambandi við løgtingsfiggjarlógina fyri 1986 søkti felagið um at fáa játtaðar kr. 247.500. Felagið fekk játtaðar kr. 220.000 kr.- og raksturin hevur tí ikki verið sum ætlað. Vónandi verður í ár møguligt at fáa játtan til ætlanina, sum fevnir um:

1. Húsaleiga	57.600 kr.
2. Ráðgeving	39.400 kr.
3. SEV, TLF og kunngerðir	41.400 kr.
4. Reingerð	8.400 kr.
5. Altjóða útbúgvingarkort	33.000 kr.
6. Skrivstovutilfar	17.200 kr.
7. Útbúgvingarsavn	10.920 kr.
8. Bókhald	5.000 kr.
9. Íbúðarformidling	10.920 kr.
10. Arbeiðsbólkar	8.700 kr.
11. Millumtjóða samstarv	15.000 kr.
Tilsamans	247.500 kr.

Av tí at felagið í fjør fekk játtað 220.000,- hevur ikki verið møguligt at arbeitt víðari við pkt. 7. og 9. Sera stórur tørvur hevur kortini víst seg at verið á bæði íbúðarformidling og útbúgvingarsavni.

Av tí at prisvøksturin hevur verið lítil og eingin, eru tølini óbroytt í mun til umsóknina í fjør og roknað verður við at tølini halda fyri komandi ár.

Á hesum grundarlagi søkir felagið um at fáa játtaðar kr. 247.500 figgjarárið 1987.

Ad § 14 - 14953/313455 — Ungdómsfelag Føroya

Sbrt. skriv 4. juni 1986:

Viðvíkjandi: *Umsókn um stuðul á landsins fíggjarlóg 1987.*

Vit vilja við hesum søkja um at fáa 105.000,00 kr. játtaðar sum stuðul á fíggjarlógini 1987.

Hvussu fram er komið til hesa upphæddi, vilja vit vísa til áður innsenda umsókn um somu upphæddi, fyri fíggjarári 84/85.

Vil vóna um sakliga viðgerð og at upphæddin verður okkum játta, vilja vit takka fyri fyrr sýnda vælvild.

Viðmerkingar landsstýrisins:

Uppskot landsstýrisins er at játta 352.000,- kr., soleiðis at veitt verður:

L.F.Ú.	247.500,- kr.
U.F.	105.000,- kr.

Ad § 15 - 15109 Føroya landsbókasavn

Sbrt. skriv dagfest 5. juni 1986:

Viðv. uppskoti til fíggjarætlan 1987 fyri Føroya Landsbókasavn rakstrarstað 15109 á fíggjarlogtingslógini.

Vísandi til uppskot okkara dagf. 5/6-1986 til fíggjarætlan 1987 fyri stovnin, ynskja vit hesa broyting.

Skrivarastarvið á Landsbókasavninum er í løtuni normerað sum 37/42 av vanligari arbeiðstíð. Arbeiðsuppgávurnar á Landsbókasavninum gerast fleiri og fleiri, og tess størri stovnurin verður, tess meir verður at gera hjá skrivaranum.

Í samband við at núverandi skrivari t. 14/7-1986 hevur sagt seg úr starvinum frá 1/9-86, søkir Landsbókasavnið um at fáa starvið sett sum heilt starv frá og við 1. januar 1987.

Vit loyva okkum ti at broyta uppskot okkara til figgjarætlan 1987, saubært viðlagda skjal, soleiðis at vit sokja um lon til skrivara í heilt starv istaðin fyri 37/42 av vanligari arbeiðstið.

Vónandi ber til at rætta hetta.

(Skjal 1. a) kr. (1000)

Kontonummar og navn § 15-15109 Fø. Landsbókas.	Roknsk. 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppsk. 1987	Uppsk. landss. 1987
103048 Løn/tænastumenn	178.214	80.0	243.6	243.6
103143 Løn/starvsfólk	1.150.291	2.412.0	1.853.8	1.702.4
103168 Løn/sáttmálalønt	83.063	136.0	291.1	291.1
103122 Løn/reingerð	79.203	139.0	148.0	148.0
103288 Løn/onnur	164.415	133.0	221.0	120.4
113002 Ferða- og dp. innl.	1.294	2.0	2.0	2.0
133050 Fólkatrygging	3.213	4.0	4.0	4.0
213105 El, hiti og vask	144.660	185.0	216.8	216.8
213503 Umsiting	65.069	16.0	70.0	70.0
213702 Ognartrygging	22.953	26.0	26.0	26.0
223404 Innbúgv	235.817	260.0	270.0	200.0
233156 Prentlutir	3.005	18.0	18.9	18.9
233259 Postgjald	28.062	30.0	44.4	44.4

Skjal 1 b) kr. 000

Kontonummar og navn 15-15109 Fø. Landsbókas.	Roknsk. 1/4-31512-85	Játtan 1986	Uppsk. 1987	Uppsk. landss. 1987
233259 Telefon og Telex	24.294	40.0	42.0	42.0
233409 Leiga av maskin.	11.070	26.0	48.0	48.0
233561 Aðrar skrivst. útr.	22.827	31.0	32.6	32.6
253085 Bókakeyp og innb.	390.162	500.0	985.8	785.8
253903 Aðrar útreiðslur	0	5,8	6,1	6.1
Ymiskt mentunarvirks.	0	0	10.0	10.0
Skeiðvirksemi	0	0	15.0	15.0
Serjáttan til telduútgerð	0	0	350.0	200.0
	2.577.6	3.743.8	4.899.2	4.227.1

Viðmerkingar:

103048 Løn og tænastumenn

Landsbókavørðurin verður løntur í 34. lønarflokki.

19.991.21 í 12 .....240 kr.

1,5 % frítíðarsamtýning .....3.6 kr.

.....243.6 kr.

Landsbókavørðurin hevur, 22.05.1986, søkt um longt farloyvi frá 01.11.1986 - 01.11.1987.

103143 Løn/starvsfólk

Roknað er við lønini pr. 01.06.1986 við teimum aldursviðbótum, ið koma afturat innan 31. des. 1987 + 1,5 % í frítíðarsamsýning + 5,5 % í eftirlønargjaldi.

Føst størv

a) 1 fyrsti bókavørður 18. lønarfl. 6. st. .....170.7 kr.

b) 1 bókavørður 20. lønarfl. 9. st. .....184.2 kr.

c) 1 bókavørður 15. lønarfl. 8. st. 37/42 .....145.3 kr.

d) 1 bókavørður 15. lønarfl. 4. st. 37/42 .....157.2 kr.

e) 1 bókavørður 15. lønarfl. 3. st. 37/42 .....155.3 kr.

f) 1 bókavørður 15. lønarfl. 6. st. 37/42 .....0.0 kr.

½ starv á Føroya Læraraskúla (sbrt. skriv F. L. j. nr. 373-26). Lønin verður endurgoldin av Føroya Læraraskúla.

Nýtt starv g)

1 bókavørður 15. lønarfl. 1. st. .....151.4 kr.

Vísandi til »Álitið um Fróðskaparsetur Føroya« (1986) og ynskini frá teimum ymisku stovnunum á Debesartrøð, verður søkt um játtan, ið skal verða settur á Landsbókasavninum og røkja uppgávuna sum felags bókavørður hjá stovninum á Debesartrøð. (SÍ SKJAL III)

h) 1 hjálparfólk 15. lønarfl. 9. st. .....166.8 kr.

i) 1 hjálparfólk 9. lønarfl. 14. st. .....153.4 kr.

j) 1 hjálparfólk 9. lønarfl. 14. st.	153.1 kr.
k) 1 hjálparfólk 12. lønarfl. 4. st.	145.7 kr.
l) 1 skrivari 12. lønarfl. 3. - 37/42	126.6 kr.
m) 1 bókbindari 15. lønarfl. 1. - 21/42	75.7 kr.
	1.785.7 kr.
+ Fritíðarsamsýning 1,5 %	26.8 kr.
+ Eftirlønargjald 5,5 %	98.3 kr.
	1.910.8 kr.
+ Endurgjald frá bókasøvnum	71.0 kr.
Løn til starvsfólk tilsamans	1.839.8 kr.

Viðmerkingar:

103168 Løn/sáttmálalønir:

Vísindabókaverðurin er løntur eftir
sáttmála við donsku Magisterforeningen.

Bruttoársløn sbrt. sáttm. okt. 1985	229.1 kr.
2 eyka dýrtíðarviðbøtur á kr. 1.248	2.5 kr.
Viðbót eftir avtalu við Føroya Landsstýri	32.5 kr.
Eftirlønargjald 10 %	22.7 kr.
	291.8 kr.
+ Fritíðarsamsýning 1,5	4.3 kr.
	286.8 kr.

103222 Løn/reingerð:

2 fólk á 60 tímar á kr. 66,14 = 7.936,80	100.0 kr.
Høvuðsreingerð, avloysarar, vindeygavask	48.0 kr.
	148.0 kr.

123288 Løn/onnur

1) Roknað er við fylgjandi avloysarum vegna summarfrí:
2 bókavørðir á 3 mðr.

Hetta verður 6 mðr. á kr. 12.616,	75.7 kr.
+ 10,25 % í frítíðarløn	7.8 kr.
2) Húsvørður	7.0 kr.
3) Urtagarðs- og annað bønarmansarbeiði	30.0 kr.

4) Vegna farloyvi hjá landsbókavørðinum hevur 1. bókavørðurin rokt landsbókavarðarstarvið 01.11.1985 - 01.11.1986. Avloysari fyri 1. bókavørðin fer bert at arbeiða í 5 mðr. í 1986. Tann soleiðis sparda lønin verður ístaðin løgd aftrat her til avloysara í 1987.

Lønin í 7 mðr. 18. lønarfl. 1. st.	94.0 kr.
+ 1.5 % fritíðarsamsýning	1.4 kr.
+ 5,5 % eftirlønargjald	5.2 kr.
	221.1 kr.

213105 El, hiti og vask

Streymnýtsla 67.000 kwt × kr. 1,50	100.5 kr.
Kw-gjald	1.3 kr.
Ljósrør v.m.	8.0 kr.
Olja 32.000 l. á kr. 3,-	96.0 kr.
Eftirlit við hitaverki og ljósi	3.5 kr.
Vask (tilfar)	7.5 kr.
	216.8 kr.

253085 Bókakeyp og innbinding

Krøvini til støri bókakeyp eru vaksandi. Prísvøksturin er stórur. Prísurin á føroyskum bókum hevur hækkað um 15 % um árið nú í fleiri ár. Innbindingarprísurin er somuleiðis uppfarin og neyðugt verður at lata meira innbinda enn higartil, serliga av føroyska tilfarinum. Eitt eintak av hvørjari av teimum í alt 99 bókunum, ið komu út á føroyskum í 1985, kostaði kr. 8.626,-. Í miðal keypa vit:

40 eintøk á kr. 8.626,-	345.0 kr.
+ innbinding (30 eint. × 50 titlar × kr. 70,-)	105.0 kr.
Føroyski parturin	450.0 kr.
Útlendski parturin	450.0 kr.
Tíðarrit og blød	85.8 kr.
Vit hava ikk ráð at hava hesa upphæddina lægri enn	985.8 kr.

Nevnast kann, at stovnar sum t.d. Býarbókasavnið og Landsmiðstøðin fyri undirvísingarambod hava fyri 1986 ávikavíst játtað kr. 1.080.000,- og kr. 800.000,- at keypa og hinda bøkur inn fyri. FØROYA LANDSBÓKASAVN fær ikki virkað við eini bókakonto upp á kr. 500 600.000,-.

233259 Postgjald

Útreiðslur fyri postgjøld januar-mars 1986 vóru kr. 11.110,- Mett Útreiðsla fyri 1987: kr. 11.100 × 4 ..... 44.4 kr.

223404 Innbúgv

Á Landsbókasavninum hava vit næstan allar árgangir av øllum teimum føroysku bløðunum á filmi, og vit hava fólkateljingarnar somuleiðis á filmi. Lesitólið, ið brúkt verður í dag, er 6 ára gamalt. Orsakað av at stovnurin bert hevur eitt slíkt tól, samstaddis sum Landsbókasavnið er einasta stað í landinum, har allar hesar keldur eru alment atgongiligar — so verður brúkið av hesum lesitólk tess størri, og sigast kann at tólið er longu nógv merkt av sliti. Søkt verður um játtan til keyp av nýggjum
lesitóli: ..... 100.0 kr.

Fyri at játtaði bókbindarin á stovninum kann fara til verka, má hann hava amboð og útgerð at arbeiða við á bókbindaraverkstaðnum. Ein kostnarætlan til ta neyðugasta útgerðina er mett til ..... 140.0 kr.
Annað innbúgv: ..... 30.0 kr.
Tilsamans: ..... 270.0 kr.

213503 Umsiting:

Vegna lekar verða vit noydd at umvæla vindeyguni uppi á lekjuni.
..... 70.0 kr.

233409 Leiga av maskinum:

Vit hava í 1986 leigað eina nýggja fotokopieringsmaskinu, ið fer at kosta okkum um kr. 4.000,- um mánaðin ..... 48.0 kr.

Inntøka av ljóstøkum verður bókað á konto nr. 233561.

Nýggj konton:

Ymiskt mentunarvirksemi.
Eitt av endamálum Landsbókasavnsins er sambært lógina, at »...fremja útbreiðslu av kunnskapum og upplýsing í landinum...« Hesin peningur er ætlaður til útreiðslur í samband við framsýningar, samsýningar til fyrilestrar, upplesarar o.l. ..... 10.0 kr.

Skeiðvirksemi.
Skulu vit ikki stoðga upp fagliga, mugu vit hava møguleika, annaðhvørt at senda starvsfólk á skeið — ella møguliga sjálvi at skipa fyri skeiðum í samband við bókasavnsarbeiði ..... 15.0 kr.

Serjáttan til telduútgerð.

1) Tekniskt er Føroya Landsbókasavn ikki komið longur enn til tað elektrisku skrivmaskinuna. Spurningurin um at stovnurin útvegar sær nýggjan ritbúnað er alsamt vaksandi, og trýstið frá samfelagnum um at fylgja við og geva brúkarunum eina skjótari og effektiari tænastu veksur, so hvørt sum aðrir stovnar og tættir í landinum verða útbygdir t.d. skúlaverkið, Fróðskaparsetrið, fiskivinnan o.s.fr.

2) Føroyski Bókalistin er støðið undir bókasavnsarbeiði Landsbókasavnsins, og mest týðandi parturin av endamálinum hjá Føroya Landsbókasavni er at savna og skráseta alt føroyskt tilfar og alt tilfar viðvíkjandi Føroyum — í Føroya deild savnsins. Sum nú er, fer alt hetta arbeiði fram manuelt, og verður nú miðað ímóti at fáa bókalistan, Føroya deildina, og síðani alt tilfarið á Landsbókasavninum telduviðgjørt.

3) Føroya Landsbókasavn hevur eisini fingið fleiri úbeitanir — bæði frá føroyskum og útlendskum útgevarum — um at fáa í lag eina sokallaða ISBN/ISSN-skipan í Føroyum. Í stuttum er hetta eitt lið í eini altjóða skipan, ið gevur øllum ritum, útgivnum í Føroyum, hvør

Nýggj kontom:

Serjáttan til telduútgerð (framh.)

sítt nummar. Nummarið verður prentað á ritið, samstundis sum tað verður lagd á disklingar og potað inn í teldur. Á henda hátt kunnu brúkarar og møguligir keyparar av føroyskum ritum, hava nógv lættari við at fáa fatur á føroyskum lesnað.
Svar okkara til hesar áheitanir hevur verið og er enn, at Landsbókasavnið er sinnað at átaka sær hesa uppgávu, tá ið neyðug telduútgerð er fingin til vega.

Til tess at fara undir alt hetta arbeiði, mugu vit fáa játtan til nývegan av telduútgerð fyri ..... 350.0 kr.

Samandráttur av viðmerkingum til umsókn um felags bókavirðið til stovnarnar á Debesartrøð.

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN førir í brævi fram, at kvøvini til kanningar av fiski og teimum umstøðum, fiskur í føroyskum sjógvi livir undir, kanningar í samband við fiskaaling o.m.a. eru vaksin heilt nógv, og ein treytin fyri at kunna gera hesar kanningar til lítar er at hava eitt gott og fjølbroytt bókasavn við hond.

Hesi krøv gera at eitt miðvísari bókasavnsarbeiði verður gjørt á stovninum enn tað, sum starvsfólkini higartil hava kunnað gjørt eftir førimuni og áhuga. Fiskirannsóknarstovnan styðjar tí fult umsóknini um at seta eitt bókavørð at taka sær av teimum ymisku bókasøvnunum á Debesartrøð.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVA styðjar eisini umsóknini og sigur seg hava tørv á einum bókavørði at taka sær av innkeypi av bókum og at fáa skil á útlánið. Starvsstovan hevur nógv tilfar út til skúlanæmingar, privat virki og stovnar av ymsum slag, og eisini til at halda skil á tíðarritum, bókasavn og tí nógv søguliga tilfar, stovnurin hevur í varðveitslu frá bæði Fiskiídnaðarstovninum og Starvsstovuni.

FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN viðmælir somuleiðis, og minnir á, hvussu hent tað hevði verið at fingið allar bøkur hjá teimum ymisku stovnunum skrásetlar. Hetta hevði t.d. havt við sær, at bert eitt eintak av eini bók verður keypt, og harvið varð játtanin til bókakeyp betur útnyttað.

FØROYAMÁLSDEILDIN hevur stóran tørv á úthúnum fólki at taka sær av skipan og skáseting av bókasavninum — eitt langrøkið arbeiði, tí tað skal byggjast upp frá grundini, eftirsum einki útbúgvið fólk hevur verið í longri tíð til hetta arbeiði. Hartil kemur arbeiðið við at skriva kort til kortsavnið og annað umsitingararbeiði, ið neyðugt er, um næmingar, lærarar og annað starvsfólk skal kunna hava fult gagn av bókasavninum. Eisini verður nevnt, at ætlanin hjá deildini at fara undir høvuðsgreinarnám ger tað átrokandi, at handbókasavnið (uml. 10.000 bind) kemur í ruttlag sum skjótast.

STØÐISÚTBÚGINGIN førir nakað tey somu sjónarmið fram sum Náttúrugripasavnið.

GUDFRØÐIDEILDIN hevur eisini tørv á serkønum at standa fyri skráseting av bókum og tíðarritum.

FØROYA FORNMINNISSAVN sigur, at hjálp og leiðbeining frá einum bókavørði hevði økt munandi um nýtsluvirðið av tí reiðiliga stóra savni av fakbókmentum, stovnurin eigur. Ein bókavørður kundi skipað og skrásett bøkurnar eftir tørvi við hjálp frá starvsfólkunum, ráðgivið stovninum viðv. reglum fyri nýtslu av bókasavninum, havt eftirlit og røkt savnið, og ráðgivið stovninum viðv. bókakeypi -- og hetta kann sum frá líður verða útbygt til samskipan av bókakeypi hjá stovnum og Landsbókasavninum, og skrásetingin útbygd til felagsskrá.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er ikki at játta 1 nýggjan bókavørð 151.000,- kr.

Ad § 15 15202 Fólkabókasavn

Sbrt. skriv dagfest 5. juni 1986:

kr. (1000)

Kontonummar og navn § 15 - 15202 Fólkabókasavn	Roknsk. 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landss. 1987
253011 Eftirlit	3.0	3.0	3.0	3.0
253189 S.bókas., nýstovn.	330.0	440.0	440.0	440.0
253202 R. høvundasamsý.	59.3	84.1	93.5	93.5
253219 Bygg. av bókas.	0	4.750.0	3.750.0	2.000.0
253227 Bókabilatænasta.	179.1	274.0	922.3	922.3
373106 Rakstrarst. fólkab.	1.839.4	3.289.1	3.735.3	3.735.3
373114 do. skúlab. søvn	0	72.0	72.0	72.0
323389 Ljóðbókagerð	0	30.0	55.0	55.0
				7.321.1

Viðmerkingar:

253189 Skúlabókasøvn, nýstovning

Í samráð við Landsskúlafyrisitingina er upphæddin óbroytt. Roknað verður við 8 nýstovnaðum skúlabókasøvnunum í framhaldsdeildum og 10 við smærri skúlar. Uppskotið er, at játtaðar verða kr. 30.000 til hvørt av teimum 8 og kr. 20.000 til hvørt av teimum 10 til stovnseting og keyp av grundstovni.

253202 Rithøvundasamsýning:

Upphæddin er sambært gr. 8 í bókasavnslógini ásett at svara til 2,5 % av játtanini til bókasavnsraksturin. Í 1985 vóru 72 rithøvundar, sum skriva á føroyskum, umboðaðir í bókasøvnunum við 6.784 bókum. Gjaldið pr. bók var kr. 11,64.

253219 Bygging av bókasøvnum:

Upplýst er um byggiætlanir í Havn fyri 4 mió. kr. og í Fuglafirði fyri 3,5 mió. kr. — Eftir gr. 6 og 7 í bókasavnslógini letur landið 50 % í byggistudningi.

253227 Bókabiltænasta:

Koyrt verður frá 01.01. 31.05. og frá 01.09. - 31.12.1987. Royndarkoyringin við einum leigaðum bókabili til 20 plúss í Eysturoynni og Streymoynni í 1985 og 1986 eydnaðist stak væl og vísti, at tørvurin er stórur, og at henda bókasavnstænasta eigur at verða útbygd.

Higartil, t.v.s. tey trý síðstu fíggjarárini (1984/85: 1985: 1986) hava vit gjørt eina íløgu fyri tilsamans uml. kr. 564.000,- í samband við bókabilin. Her verður hugsað um innbúgv í tann leigaða bókabilin fyri kr. 134.000,- og bøkur fyri tilsamans uml. kr. 430.000,. Burtursæð frá løn til bilstjóran og leigu av bilinum eru allar aðrar útreiðslur í sambandi við bókabiltænastuna, so sum t.d. løn til starvsfólk og bókakeyp, farnar av játtanini til Føroya Landsbókasavn.

Í royndartíðini hevur bókabilsvirksemið verið eykaarbeiði hjá tveimum bókavørðum og einum hjálparfólki í teir 8 mánaðirnar av árinum, koyrt hevur verið, soleiðis at skilja, at fólk hevur verið flutt úr øðrum uppgávum á Landsbókasavninum og út í bilin. Hetta hevur gingið útyvir aðrar uppgávur á stovninum, uppgávur, sum ikki framhaldandi kunnu verða lagdar til viks.

Bókabiltænastan er fólkabókasavnsvirksemi burturav, og meta vit tað tí vera træffast, at allar útreiðslur í samband við hesa bókasavnstænastu fara av konto ..... 15 - 15202 ..... Fólkabókasøvn.

253227 Bókabiltænastan (framh.):

Tað skal eisini viðmerkjast, at hóast bókabilurin bert er leigaður í 9 mánaðir av árinum, so fara bókavørðir og hjálparfólk at arbeiða alt árið í samband við bókabilatænastuna.

2 bókavørðir 15. lønarfl. 1. st.	324.0 kr. (1)
1 hjálparfólk 9. lønarfl. 1. st.	137.3 kr. (1)
Leiga av bili í 9 mánaðir	110.7 kr.
KM-gjald. kr. 3, pr. koyrdan km.	60.0 kr.
Varmagjald (um náttina og tá bilurin stendur)	8.1 kr.
Løn til bilførara í uml. 1.290 tímar	90.3 kr.
Yvirtíð og eykaarbeiði	30.0 kr.
Fritíðarløn	12.3 kr.
Tíma- og dagpeningur (1.290 á kr. 11,-) × 3	42.6 kr.
Bókakeyp og innbinding (800 × kr. 120,-)	96.0 kr.
Aðrar útreiðslur	11.0 kr.
(1) roknað 1,5 % frítíðarsamsýning og 5,5 % eftirlønargjald.	922.3 kr.

://: Frágreiðing frá virksemi bókabilsins í royndartíðini 1985/86 (sí skjal nr. III).

373106 Fólkabókasavn, rakstrarstuðningur

Yvirlitið niðanfyri er sett upp eftir figgjaravtlanini hjá hvørjum bókasavni. Bókasøvn, ið eisini eru skúlabókasøvn, eru, sum vant likin við her.

	Figgjaravtlan 01.01-31.12-86	Stuðningur 1987
a) Bókasavnið í Nes kommunu	40.000	24.000
b) Býarbókasavnið	4.232.000	2.539.200
c) Eiðis Bókasavn	10.000	6.000
d) Fuglafjarðar Bókasavn	353.000	211.000
e) Glyvra Bókasavn	101.200	60.720
nýstovnað f) Hvalvíkar Bókasavn	60.000	32.000
g) Klaksvíkar Bókasavn	624.700	374.820
h) Kollafjarðar Bókasavn	77.700	46.620
i) Leirvíkar Bókasavn	103.100	61.860
j) Sandavágs-Miðvágs Bókasavn	56.424	33.854
k) Strandar Bókasvn	185.977	111.540
l) Sunda Bóksavn	14.200	8.520
m) Sørvágs Bóksavn	50.700	30.420

373106 Fólkabóksavn, rakstrarstuðningur (framh.)

	Figgjaravtlan 01.01.-31.12.-86	Stuðningur 1987
Flutt:	**5.909.001**	**3.540.554**
n) Tvøroyrar Bókasavn	120.300	72.180
o) Vágs Bókasavn	117.300	70.380
p) Vestmanna Bókasavn	87.000	52.200
	6.233.601	3.735.314

373114 Rakstrarstundingur, skúlabókasøvn

Roknað verður við somu upphædd sum fyri árið 1986. Heimildini viðvíkjandi verður víst til viðmerkingina til gr. 15 15202/373106 í fíggjarløtingslógin fyri 1985: **Rakstrarstundingurin verður eisini at galda skúlabókasøvn.**

Endaligar stundingsreglur fyri skúlabókasøvn verða settar í endurskoðaðu bókasavnslógina.

323389 Ljóðbókagerð

Miðað eigur at verða eftir at fáa innlisnar 30 titlar á føroyskum í 1987.

Framleiðsluútreiðslur	15.0 kr.
Sertól o.a.	25.0 kr.
Húsar, spjøldur og skrivstovuútreiðslur	15.0 kr.
	55.0 kr.

Aðrar viðmerkingar:

Víst verður til uppskot landsbókasavnsins um serligan **stuðul til føroyska bókaútgávu** (sí Fylgiskjøl til fíggjarløtingslóg 1. apríl - 31. desember 1985, bls. 153-154). Verða t.d. settar kr. 500.000,- av, kann studningurin til bókasavnsraksturin lækkast við umleið tilsvarandi upphædd.

B Ó K A B I L U R I N

29. apríl koyrdi bókabilurin síðsta túrin áðrenn summarsteðgin. Landsbókasavnið fór undir bókabiltænastu á grækarismess í 1985, og hevur tíðin higartil verið ein royndartíð. Endamálið við hesi royndartíð hevur, umframt at útvega fólki bókasavnstilfar, eisini verið at kanna um tørvur er á slíkari bókasavnstænastu.

At farið varð undir bókabiltænastu er í tráð við galdandi lóg um fólkabókasøvn, ið hava til endamáls at fremja upplýsing, og lærdóm og mentunarvirksemi...«.

ROYNDARTÍÐIN.

Henda royndartíðin hevur víst, at fólk hava verið sera glað fyri hetta tilboð við bókabilinum úti á bygdunum, og tiltakið hevur ríkiliga prógvað, at tørvurin á góðari bókasavnstænastu er heilt stórur í øllum teimum mongu bygdunum og kommununum, sum einki bókasavn hava. Tað hevur eisini til fulnar víst, at bilurin er frægasta loysnin úti á smábygdunum. Her kemur bókasavnið til teirra — um tað so bert er eina ferð um vikuna — og við bilinum er altíð fólk, sum dugir at leiðbeina og hjálpa.

Hetta tíðarskeiðið hevur bókabilurin koyrt til 21 bygdir í Eysturoynni og á Streymoynni.

Samlaða fólkatalið í hesum bygdum er um 5.000. Lánaratalið hevur verið uml. 1.300, 64 % børn og 36 % vaksin, og hava hesi vitjað bilin um 12.000 ferðirnar. Bilurin steðgaði í tilsamans 426 tímar.

Í bilinum rúmast um 3.500 bøkur og hevur útlánið verið:

BØRN:	24.602 bøkur.
VAKSIN:	5.012 bøkur.
Tils.	29.614 bøkur.

BØRNINI LÁNA MEST

Mett verður, at ein av orsøkunum til at talið av vaksnum lánarum er heldur lágt í mun til talið av børnunum, er at bókabilurin hevur vitjað flestu bygdirnar í einum tíðarskeiði, har tað mest arbeiðsføra fólki hevur verið til arbeiðis - ofta burtur aðrastaðni ella til skips. Tó hevur koyriætlanin verið løgd soleiðis til rættis, at tann største bygdin liggur síðst á hvørjum túri, so at flest møgulig vaksin hava havt høvi at vitja bókabilin.

At børnini hava havt stóra gleði av hesum tilboði sæst av tølunum, ið, vísa, at um 55 % av øllum børnunum í økinum hava fingið sær lánarakort í bókabilinum.

Leggjast kann aftur at, at henda stóra undirtøkan ímillum børn, hevði við sær, at meðan Landsbókasavnið var í ferð við at byggja upp ein grundstovn av barnabókum, vóru vit noydd at avmarka útlánið, soleiðis at hvørt barn bert kundi lán 3 bøkur hvørja ferð.

IKKI BARA BÓKAÚTLÁN

Umframt at lána bøkur út og annars at leiðbeina lánarum, hava starvsfólk í bilinum eisini avgreitt fyrispurningar av ymsum slag. Fólk hava eisini vitjað bilin uttan at lánt bøkur; tey hava sitið og hugt og blaðað og lisið í bókunum. Soleiðis kann ein bókabilur eisini brúkast. Ta sístu vikuna høvdu vit dukkuleikir fyri børn, og eydnaðist hetta tiltakið stak væl.

Royndin við bókabilinum hevur víst, at tørvurin á bókasavnstænastu eisini er stórur á plássunum uttan fyri tær størri bygdirnar. Ein bókabilur, við sínum avmarkingum, kann aldri koma ístaðin fyri eitt bókasavn. Men tá ið tað er óhugsandi, at hvør lítil bygd fær sítt egna bókasavn, verður mett, at tann rætta loysnin er ein bókabilur.

framhald talvan.....

niðanfyri

Ad § 15 -- 15304 Føroya landsskjalasavn

Sbrt. skriv dagfest 12. juni 1986:

kr.
(1000)

Kontonummar og navn Rakstrarstuð 15304	Rokning 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landsst. 1987
103143 - løn - starvsfólk	547.6	580.0	736.0	576.0
103151 - løn - avloysarar	0.0	35.0	36.7	36.7
103168 - løn - sáttmálal.	288.0	361.0	460.0	450.0
103288 - løn - onnur	0.0	30.0	31.5	31.5
103296 - løn - tímaløn	0.0	120.0	180.0	180.0
103406 - løn - útlíðarløn	0.0	3.0	3.0	3.0
113202 - ferða- og dagpen., innanlands	5.5	5.0	5.0	5.0
213105 - el, hiti og vask	86.8	60.0	100.0	100.0
213408 umvælingar, o.l.	42.5	20.0	21.0	0.0
213702 - ognartrygging	4.2	10.0	10.5	10.5
213806 - leigugóreiðslur	48.3	130.0	136.5	136.5
223404 - flutningur	40.5	37.5	40.0	40.0
233051 - innbúgv	151.8	100.0	530.0	500.0
233155 - prentlutir	14.6	3.5	3.7	3.7
233259 - postgjald	1.9	2.0	4.0	4.0
233354 - telefon og telex	18.4	15.0	30.0	30.0
233409 - leiga av mask.	8.3	30.0	31.5	31.5
233561 - aðrar skriv.s.útr.	26.3	38.0	40.5	40.5
233703 - EDV - leiga	0.0	0.0	150.0	100.0
233711 - EDV - fovril	0.0	0.0	30.0	10.0
233728 - EDV - serk. hjálp	0.0	0.0	45.0	20.0
253085 - hókak. og innb.	12.1	3.0	6.0	6.0
253606 - konservering	20.6	42.0	45.0	45.0
253521 - flyting - skjalas. o.a.	1.5	10.0	10.0	10.0
253538 - pakkitilf., arkivesk.	7.3	0.0	5.0	5.0
253546 - útgáva av søgu-ligum keldum	48.5	50.0	50.0	50.0
253554 - skráseting	4.7	2.0	11.0	11.0
253562 - vísindarligur kanning.				
253903 - aðrar útreiðslur	0.0	0.0	50.0	25.0
Tilsamans	1389.8	1689.0	2802.9	2471.9

Viðmerkingar til fíggjarlógaruppskot 1987

ad. konto 103143 lon - starvsfólk
Arbeiðið á savninum er munandi vaksið, t.d. við, at skjalgoymslurnar eru tvífaldaðar eftir 4 árum. Søkt verður ti um nýnormering av yvirassistenti at standa fyri skipan og skráseting. Samstundis er roknað við, at savnsskrivarin verður framfluttur til yvirassistent.

ad. konto 103168 lon sáttmálatont
Søkt verður um normering av savnsvørði. Vist verður til bræv skifti og fundir við Landsstýrið.

ad. konto 233051 innbigv.
Vísandi til bræv skifti við Landsstýrið um mikrofilmstól til upptøku og til lesing verður søkt um kr. 380.000 til hetta endamál. Til vanligu økingina av hillaplássi verður søkt um kr. 150.000 til compactus-hillar.

ad. konto 233703 EDV - leiga
Verandi telda verður fíggjað yvir konto 233409 - leiga av maskinum. Tørvur er á tveimum teldum afturat, og verður ti sett upp serstøk konto til hetta endamál. Talan er um eina teldu til størri skrásetingar, árlig leiga kr. 120.000, og eina minni teldu til 30.000 kr. árliga.

ad. konto 233711 EDV - forrit.
Programmeringsútreiðslur verða við hesum settar á serstaka konto.

ad. konto 233728 EDV - serkon hjálp.
Savnið er noytt til í fyrstu atløgu at nýta EDV-ráðgevara frá føroyskum EDV-stovni uttan fyri savnið.

ad. konto 253554 skráseting
At nýta til skrásetingararbeiði úti um landið í samband við broyttu lógina um bygdasøvn.

ad. 253562 vísindarligar kanningar.
Henda konto verður vanliga nýtt til at løna eitt nú søgulesandi, ið gera smærri kanningar av okkara skjalatilfari innan- og uttanlands.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er ikki at játta 1 nýggjan yvirassistent.

Að § 15 - 15406 Føroya Fornminnissavn
sbrt. skriv dagfest 5. juni 1986:

Hjálagt verður sent landsstýrinum uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1987, viðvíkjandi rakstrarstaði nr. 15406, Føroya Fornminnissavn.

kt. nr.	roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot Uppsk. 1987	Landsstýris 1987
103048 Løn - tænastumenn	75.152,27	106.6	102.8	102.8
103143 Løn - starvsfólk	735.487,21	1.101.9	1.334.5	1.334.5
103168 Løn - sáttmálaløn.	748.700,23	1.075.0	1.281.4	1.281.4
103222 Løn - reingerð	68.829,06	168.0	176.4	176.4
103288 Løn - onnur	891.952,61	1.394.3	1.480.8	1.480.8
113202 Ferða- og dagp. innl.	68.960,80	100.0	105.0	105.0
203905 Ymisk kommunikat.	- 7.947,31	33.0	35.0	35.0
213105 El, hiti og vask	76.742,65	25.0	114.0	114.0
213408 Umvælingar v.m.	12.094,44	35.0	36.8	36.8
213702 Ognartrygging	37.235,00	23.7	25.0	25.0
213806 Leigutreiðslur	54.510,96	80.5	90.0	90.0
233051 Innbúgv	293.824,75	180.0	189.0	189.0
233259 Postgjald	6.992,00	10.0	12.0	12.0
233354 Telefon og telex	23.671,85	52.4	55.0	55.0
233409 Leiga av maskinum	14.565,48	34.0	36.0	36.0
233561 Aðrar skrivs.útreiðslur	17.423,55	30.5	32.0	32.0
253085 Bókakeyp og -innbind.	13.733,82	18.5	19.4	19.4
253115 Útgrevstur	57.829,35	60.0	63.0	63.0
253268 Umsiting av fornm.	114.496,39	167.5	176.0	176.0
253306 Umboð	1.140,00	20.9	22.0	22.0
253314 Aðrar umsitingarútg.	71.084,33	150.0	168.0	168.0
253322 Etnologiskar kanning.	17.068,80	27.4	28.8	28.8
253903 Aðrar útreiðslur	44.431,16	30.0	31.5	31.5
253928 Tænastuakfør, rakst.	13.834,65	20.0	21.0	21.0
	3.451.814,05	4.944.2	5.635.4	5.635.4

Viðmerkingar:

Roknskapartølini fyri 1985 eru ikki endalig.

Skjal II

	Skipað starv 31.12.1985		Nýskipað starv	Løn 01.01.1986		Nýnorm-ingar	Játtan 1986
	sett	leys		lønfl.		kr.	
Tænastum. líkn.:							
savnslærari	1/2	-		27.4	102.744,63		106.6
Sáttmálalønt:							
landsantikvarur	1	-		15	305.788,49		
savnvørður	1	-		15	293.288,49		
savnvørður	1	-		1.	213.696,08		
arkitektur	1	-		9.	254.911,59		
avloysari	-	-		6.		213.675,97	
							1.075.0
Starvsfólk:							
skrivari	30/42	-		12.7	115.829.81		
assistentur	1	-		9.10	155.813.40		
skrivst. ass	12/42	-		7.7	40.586.60		
konservator	1	-		15.7	175.236.04		
savnshjálpari	1	-		3.12	176.455.37		
savnshjálpari	1	-		3.10	174.233.80		
savnshjálpari	-	1		3.8	168.215.94		
savnshjálpari	-	-	1/2	3.8	84.108.03		
hjálparmaður	1/2	-		9.14	82.028.34		
fotografur	1	-		3.5		162.036,31	
							1.01.9

Viðmerkingar til skjal II

ad avloysari:
Søkt verður um játtan í 1 ár til avloysara fyri landsantikvarin, sum hevur søkt landsstýrið um orlov í 1 ár til liðugtgerð av átrokandi, partvíst lógarbundnum, skrásetingaruppgávum, sum áliggja savninum, men sum tað ikki altíðars eru stundir at fáa frá hondini.

ad fotografur:
Myndasavn savnsins er tey seinastu árini ikki bert økt munandi, men eisini vorðið meiri atkomuligt hjá fólki. Hetta hevur ført við sær, at ein savnshjálpari má nýta stívliga helvtina av arbeiðstíð síni til at fara um myndasavnið og til at hjálpa fólki at leita fram myndir. Áhugin fyri gomlum myndum er alsamt í øking, bæði millum fólk og í bókumenta- og vísindaligum sambandi. Tað arbeiðið, sum lagt verður í myndasavnið, verður tó stórliga tarnað av, at fotografur ikki er fast knýttur at savninum, tí ov trupult er at fáa gjørt tað neyðuga myrkakamararbeiðið og við leysari hjálp fáar tímar um vikuna hevur verið ógjørligt at fáa nóg kvalificerað fólk, sum er sinnað at røkja bæði myrkakamararbeiði og savnið við gomlum plátum og negativum við tí hugi og

innliti, sum hetta stóra virðismikla gamla savn hevur uppiborið — fleiri nyndir eru, sum eru tiknar beint eftir, at fotografering varð uppfunnin í 1852.

Skotið verður tí upp, at fotografur verður settur í fast starv.

Skjal 11 b

kt. 103288, løn onnur (leys hjálp og tímaløn).

			Játtan 1986	Uppskot 1987
1.	Fyrisiting	fritiðargjøld, 9,5 %	82.2	-
		at ráða yvir, 235 t.	15.8	-
		umsjónarmaður	136.7	170.0
2.	Fornminnisumsjón	røkt, 100 t.	6.7	7.3
		skráseting, 100 t.	67.0	79.6
3.	Dúvugarðar	røkt, 100 t.	6.7	7.3
	Skansin	røkt, 500 t.	33.3	36.5
4.	Konservering	arbeiðshjálp, 450 t.	30.1	32.9
5.	Myndasavn	fotoarbeiði, 1040 t.	72.9	82.7
6.	Fornfrøði	eftirviðgerð, 3 mðr.	46.8	54.0
		ymisk arbeiði, 350 t.	23.4	25.5
		ranns. arbeiðshj. 2625 t.	175.6	191.8
		leiðsla, 6 mðr.	93.6	108.0
		arbeiðshjálp, 7000 t.	468.2	511.0
7.	Fólkalívsdeild	skráseting, 580 t.	40.7	42.4
8.	Upplýsing	vaktarhald, 1000 t.	70.1	79.6
		økt upplatingartíð, 300 t.	-	23.9
		serfrøansýning, 350 t.	24.5	27.8
			1.394.3	1.480.4

Viðmerkingar:

Býtið millum arbeiðsøkini kann verða ávirkað av seinni broytingum í arbeiðsætlanini.

Uppskotið er í tíðarbrúki sett ájavnt við játtanina fyri 1986. Umframt verður í samráð við Náttúrugripasavnið søkt um neyðuga játtan at økja um upplatingartíðina á søvninum við 2 t. dagliga um summarið. Meirútreiðslan verður kr. 23.900.

Viðmerkt skal annars verða, at uppskotið er gjørt í samstarvi við leiðbeining landsstýrisins. Tó er konto nr. 213105 El, hiti og vask, sum fíggjarárið 1986, helst av misgávum, er skorin niður til kr. 25.000, í uppskotinum sett til veruliga brúkið.

Að § 15 - 15508 Bygdasovn
Sbrt. skriv dagfest 5. juni 1986:

Uppskot til figgjarløgtingslóg fyri 1987.

BYGDASØVN v.m.
rakstrarstað 15508

	roknsk. 1/4-31/12-85	játtan 1986	uppskot 1987	uppksot landss. 198
103509 Samsýningar	12.000,-	15.0	15.0	15.0
323293 Í grunn til gl. presth. á Nesi	38.000,-	50.0	50.0	50.0
273106 Rakstrartilskot	335.577,24	310.0	465.0	465.0
373504 Forminnisnevnd	0,0	15.0	15.0	15.0
373905 Umvælingarstu. í grunn	90.000,-	125.0	135.0	135.0
	475.577,20	515.0	680.0	680.0

Hædd er tikin fyri øktum útreiðslum, ið standast av broyting í lógini um bygdasøvn.

Að § 15 - 15551 Fiskirannsóknarstovnan
Sbrt. skriv dagfest 3. juni 1986:

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1987. Rakstrarstað 15551, Fiskirannsóknarstovan.

	kr. (1000) Roknsk 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landss. 1987
73057 Endurgjald, ríkið	+ 929	+ 925	+ 990	— 990
103143 Løn starvsfólk	345	605	510	510
103168 Løn sáttmálalønt	1.731	2.916	3.480	3.480
103288 Løn onnur	14	49	49	49
113202 Ferða- og dagpeningur	3	26	26	26
213806 Leiguútreiðslur	100	150	150	150
233051 Innbúgv	18	40	40	40
233155 Prentlutir	26	15	30	30
233259 Postgjald	6	10	10	10
233354 Telefon	44	50	55	55
233561 Aðrar útreiðslur	16	30	30	30
253306 Amboð	247	165	173	173
253339 Leiga av førum o.a.	207	300	310	310
253363 m/s Magnus Heinason	7.836	10.000	10.000	10.000
253903 Aðrar útreiðslur	11	45	40	40
	9.675	13.476	13.913	13.913

Viðmerkingar:

KONTO 103168 Sáttmálalønt.
Á landsstýrisfundi 21.02.86 (avrit av gerðabók hjálagt) X) var samstykt at seta ein fiskifrøðing av játtanini til prakliskar fiskiroyndir. Henda samtykt varð seinni staðfest av løtingsins fiskivinnunevnd. Á sama landsstýrisfundi varð eisini samtykt, at Fiskirannsóknarstovan skuldi søkja eitt fast starv til ein fiskifrøðing á komandi fíggjarlóg. Og verður hetta hervið gjørt (hetta er sama starvið).
Til fjarðakanningar og til kanningar av plantuæti, m.a. eitrandi algum, verður biðið um ein lívfrøðing og eitt hjálparfólk.

Tørvurin á fólki til fjarðakanningar er komin aftaná, at tær kanningar, vit gjørdu við Magnus Heinason í 1985 (frágreiðing send landsstýrinum) vístu nógv størri vanda fyri dálking á nøkrum firðum, enn áður hevur verið mett. Tær upprunaligu dálkingarkanningarnar í samband við aling vóru serliga ætlaðar at vera bert við alibrúkini (nærkanningar), og Fiskirannróknarstovan hevði bert lítlan part av teimum um hendi, men nevndu kanningar vístu á vandan

fyri nøkrum av fiðunum sum heild, og tí verður neyðugt at leggja størri dent á fjarðakanningarnar. Eisini her koma vit at samstarva við aðrar stovnar, men okkara partur av arbeiðinum verður vel størri enn fyri nærkanningarnar. Fiskirannsóknarstovan hevur ongantið fingið eyka fólk til fjarðakanningarn ar, og arbeiðsorkan hevur verið tikin frá øðrum uppgávum. Av tí at støðan var so álvarslig í 1985, avgjørdu vit at halda fram í 1986, hóast vit ikki fingu nakra eykajáttan. Hetta ber tó ikki til í longdini, og uttan meiri arbeiðsmegi mugu vit gevast til heystar. Kanningar av plantuæti eru ein náttúrligur partur av arbeiðinum hjá Fiskirannsóknarstovun, tí plantuæti er grundarlagið undir øllum lívi í havinum, og fullfíggjaða fatan av fiskastovnuntum fáa vit ikki, fyrr enn vit skilja gróðurin av plantuæti. Áður hava vit ikki mett tørvin á hesi uppgávu so stóran í mun til aðrar uppgávur, men uppblómingin av eitrandi algum á Trongisvágsfirði og vøksturin í alinginí broytir hesa mynd og um hendu uppgáva verður tengd at fjarðakanningunum, meta vit grundarlag vera fyri føstum starvi til ein lívfrøðing og eitt hjálparfólk.

X) til skjals á landsskrivstovuni.

§ 15 - 15653/253903 - Fuglakanningarstoð
sbrt. skriv dagfest 27. mai 1986:

Uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1987 viðv. rukstrarstaði Fuglakannlagarstøð, nr. 15653-253903.

Fiskirannsóknarstovan fekk fyrstu ferð í 1970 játtað kr. 15.000,- frá Føroya Landsstýri at nýta til lomvigakanningar.

Lomvigakanningar, (sum tó byrjaðu í 1968) hava síðani verið gjørdar á hvørjum ári, og tær kr. 3.000,-, sum frammanundan stóðu á fíggjarlógini til fuglakanningarstøð hjá Niels á Botni, vóru eftir uppskoti frá Nielsi lagdar afturat játtanini til Fiskirannsóknarstovuna til hetta endamál.

Fyrstu árini fór meginparturin av peninginum til merking av fugli og 6.248 lomvigar vóru merktir. Í 1972 fór meginparturin til eina roynd at telja allan lomvigan í Føroyum. **Royndin varð gjørd í samarbeiði við Dansk Ornitologisk Forening.** Síðani hevur Bergur Olsen regluliga talt upp í Høvdanum í Skúvoy, lutvís við automatiskum myndatólum.

Í 12 ár hevur Bergur talt o.u. 300 røkur í Høvdanum í Skúvoy. Hetta er einasta teljing av hesum slag, ið hevur verið gjørd yvir so langt tíðarskeið. Stórar broytingar (— 40 %) hava verið í lomvigatalinum hesa tíðina, og tí er sera góður møguleiki fyri at kanna t.d. hvussu ymiskt talið av lomviga er broytt á teimum

ymisku rókunum og ymsu portunum av berginum. Hesi úrslit kunnu geva eina góða ábending um, hvussu nógvir stikkprøvar eru neyðugir, fyri at hava eftirlit við einum lomvigabergi framyvir.

Bergur hevur bert fingið løn fyri feltarbeiði, og tí søkir Fiskirannsóknarstovan um pening til Bergur í fyribils eitt hálvt ár **til at viðgera og almannakunngera hesi úrslit.**

Í 1972 vórðu tey føroysku lomvigabjørgini sum nevnt tald á fyrsta sinni. Stór minking er farin fram síðani, og tí hevði tað verið av stórum týdningi at endurtiki hesa teljing í 1987, tá 15 ár eru liðin, tí Høvdin í Skúvoy, ið verður mett bert at vera 1,5 % av samlaða stovninum, er ov lítið grundarlag at meta út frá.

Bergur luttók í lomvigateljingini í 1972 og hevur fingist við lomvigateljingar síðani og skrivar speciali um »Metoder til overvågning af den færøske lomviebestand.« Í 1982 varð søkt um pening til at endurtaka lomvigateljingina í 1983, men landsstýrið gekk ikki umsóknini á møti.

Fiskirannsóknarstovan søkir tí um kr. 50.000,- til at telja lomvigabjørgini fyri í 1987 og um løn í eitt hálvt ár til Bergur fyri at skipa fyri teljingini og at viðgera og almannakunngera úrslitini.

Kontonummar og navn **Fuglakanningarstøð** **15653-253903**	**Roknsk.** **1/4-31/12-85**	**Játtan** **1986**	**Uppskot** **1987**	**Uppskot** **landsst.** **1987**
	26.166,31	20.000,-	140.000,-	140.00,-

Að § 15 - 15703 - Føroya Náttúrugripasavn
Sbrt. skriv dagfest 5. juni 1986:

Við hesum verður sent inn figgjarlógaruppskot fyri 1987. Í hjáløgdu viðmerkingum eru grundgevingar fyri umsóknum um øktar játtanir.

kr.
(1000)

Kontonummar og navn	Roknsk. 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landsst. 1987
73343 Endurgj. DGU	52.5			
103143 Løn/starvsfólk	476.3	597.0	571.0	571.0
103168 Løn/sáttmálaløn *	227.5	427.0	795.8	545.0
103222 Løn/reingerð	60.9	89.0	93.5	93.5
103288 Løn/onnur *	155.3	194.0	270.0	250.0
113202 Ferða- og dagp. i.*	17.8	12.0	20.0	16.0
203308 Lýsingar	0.0	1.5	1.6	1.6
213105 El, hiti og vask	68.4	125.0	131.3	131.3
213503 Umsiting *	89.2	80.0	549.0	515.0
213702 Ognartrygging *	20.7	10.5	20.0	20.0
213806 Leiguútreiðslur *	7.3	19.0	15.0	15.
233051 Innbúgv *	14.1	15.0	115.8	15.8
233155 Prentlutir	11.6	8.0	8.4	8.4
233259 Postgjald	4.0	6.0	6.3	6.3
233354 Telefon og telex	24.6	22.0	23.1	23.1
233561 Aðrar skrivstovuútr.	5.1	6.0	6.3	6.3
253085 Bókakeyp	6.6	9.0	9.5	9.5
253306 Amboð *	24.5	25.0	206.3	26.3
253396 Kanningar- og savn	33.7	75.0	78.8	78.8
253903 Aðrar útreiðslur	1.8	12.0	4.0	4.0
		1.733.0	2.926.0	2.337.0

Viðmerkingar til fíggjarløgtingslóg 1987.
Føroya Náttúrugripasavn. Rakstrarstaður 15703.

Løn sáttmálaløn.
Fjarðarkanningarnar í sambandi við fiskaaling, sum Náttúrugripasavnið, Fiskirannsóknarstovan, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan fóru undir í 1985, krevja so nógva arbeiðsorku, at vit ikki megna hesa uppgávu uttan nýggj størv.

Náttúrugripasavnið skal taka sær av kanningum av botndýrum — benthos. Til hetta endamál verður søkt um játtan til ein djórafrøðing. Kostnaður til løn umf. 250.000. Hetta starvið má kortini sigast at vera treytað av, at hini báðir nevndu stovnar fáa sínar umsóknir um nýggj størv.

Løn onnur.
Vit mugu rokna við at skula nýta meira av peningi til medhjálp, lutvíst til fjarðarkanningar, lutvíst til útiljálpararbeiði um summarið og annars á hinum deildunum. Eisini er tørvur á at víðka upplatingartíðirnar á framsýningunum.

Ferðapeningur
Av tí, at ein jarðfrøðingur fer at byrja her hjá okkum í ár og møguliga ein djórafrøðingur næsta ár, mugu vit rokna við at nýta meira pening til ferðir innanoyggja.

Umsiting.
Hitaverkið í gamla bókasavnsbygninginum hevur leingi verið í ringum standi. Tað stavar frá 1932, tá húsini vórðu bygd. Rørini eru tærd, nógv av teimum liggja millum skins og hold, so ikki slepst til at gera ábøtur. Ofta er kalt, so fólk noydast heim. Vit hava fingið ráðgevandi verkfrøðingafelagið Sofus Jacobsen at gera eina kostnaðarætlan. Hon ljóðar uppá kr. 425.000 (skjølini eru á Náttúrugripasavninum). Við at bjóða arbeiðið út almont, kann møguligt fáast eitt lægri boð. Tá er roknað við, at alt anleggið skal skiftast út. Hetta er tað einasta rætta, tí allar ábøtur higartil hava verið dýrari og hjálpt lítið vindfang. Fyri at spara hita er neyðugt at gera eitt vindfang í forhøllini á gamla bókasavninum. Tá allar framsýningarnar standa uttan hurðar ímillum, er tað avgjørt neyðugt at fáa gjørt hetta vindfangið. Hetta kemur at kosta umleið 40.000 kr. Bæði hesi tiltøkini meta vit vera av stórum týdningi fyri at hava ein bygning í góðum standi. Orkusparingin fer at vera stór. Sum er gjalda vit alt ov nógv í olju til at halda húsini heit.

Ognartrygging.
Vit hava saman við Kjartan Dalsgarð, tryggingarmanni gjøgnumgingið allar tryggingar. Vit hava hækkað endurgjøldini og nýteknað móti innbroti og her-

verki. Av tí at brunatryggingargjøldini eru niðurfarin, er tryggingin bilig — umleið 20.000 kr. tilsamans.

Innbúgv. Tekstviðgerðartól.
Náttúrugripasavnið hevur gjøgnum árini savnað ein hóp av upplýsingum data — innan jarðarfrøði, plantufrøði og djórafrøði. Hetta tilfarið er í ymiskum kartotekum. Við framvøksti í telduskipanini, sum er farin fram meta vit, tað vera av stórum týdningi at fáa alt hetta sett í telduskipan, tí tað vil spara nógva tíð. * Tær stóru grindakanningarnar og fuglateljingarnar mugu viðgerast við EDB. Tekstviðgerðartól finnast nú á flestu stovnum uttan okkara. Tað skal eisini kunna nýtast til programmering og útrokningar av ymiskum slag.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er ikki at játta 1 nýttjan djórafrøðing 250.000, kr.

Amboð.
Frystiturkilag frá HEVO í Birkerød. Skrivligt tilboð galdandi til 1/4-1987 kemur í 24. viku.

Prísur umt. 180.000 kr.
Eitt frystiturkilag hevði økt møguleikarnar hjá savninum at konservera fuglar munandi, tí tað krevur onga passing, meðan turkingin fer fram. Tað er heldur ikki neyðugt at taka innvølin úr dýrinum, ádrenn tey verða frystiturkað, uttan so at hann skal nýtast til serligar kanningar framíhjá.

Tá ið savnið fær smáfuglar inn, hava teir vanliga verið deyðir so leingi, at frystiturking er einasti máti at konservera teir. Vanlig skinnlegging kann ikki gerast. Av tí at nógvir av teimum innkomnu fuglunum eru sjáldsamir her um leiðir, eiga teir at verða varðveittir, og tá er frystiturking einasti møguleiki.

Djór farast eitt sindur av at verða nýtt til framsýningar. Eitt frystiturkilag hevði spart tíð, soleiðis at savnið altíð kundi havt eitt úrval av snotiligum djórum, ið hóskaðu til framsýningarnar.

Frystiturking er einasti máti at konservera soppar og er frálíka góður og tíðarsparandi turkingarháttur til plantur m.a. til framsýningar.

* Eisini til brøv og handrit tekstviðgerðartól eru ómetaliga stórur hetti.

Ad § 15 - 15717 Jarðfroðisavnið, Samarbeiði við D.G.U.
Sbrt. skriv dagfest 23. mai 1986:

Hervið verður sent inn fíggjarlógaruppskot fyri rakstrarstað 15717 (Samarbeiði millum Jarðfrøðisavnið og DGU) fyri fíggjarárið 1987.

Tølini eru tey somu sum í 1986, men við tað, at samarbeiðsfundur um býti millum Jarðfrøðisavnið og DGU ikki verður fyrrenn í oktober í ár verður fyrivarni tikið fyri møguligum broytingum.

Kontonummar og navn 15717 Samarbeiði millum Jarðfrøðisavnið og DGU.	Rokn skapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landsst. 1987
103058 Endurg. til ríkið		245.000	245.000	245.000
253459 Útreiðslur viðv. arkivering og goymslu (Jarðfrøðisavnið		60.000	60.000	60.000
213806 Húsleiga v.m. endurgjald til Føroya Náttúrugripasavn.		70.000	70.000	70.000
253396 Kanningararbeiði og fremmandaveitingar (sbrt. DGU).		75.000	75.000	75.000
				450.000

Ad § 15 - 15755 Fróðskaparsetur Føroya
Sbrt. skriv dagfest 6. juni 1986:
Uppskot til fíggjarætlan fyri 1987
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA — rakstrarstað 15755 á fíggjarlogtingslógini
Uppskotið til fíggjarætlan 1987 fyri Fróðskaparsetur Føroya fekk endaliga viðgerð á fundi í setursráðnum 4. juni 1986. Upphæddirnar, ráðið samtykti at senda í uppskotið, eru so statt greiðar at seta landsstýrinum. Tær eru samantaldar settar upp í hjálagda skjali, viðheft serskjal, sum vísir býtið av upphæddunum út á setursskrivstovu og deildir. Somuleiðis er við útfyllingarblað viðv. størvum saman við fylgiskjali, har starvsskipan og lønir pr. 1.1.1986 eru gjølliga útgreindar.

Harafturímóti hava tíverri ikki verið stundir til at samanskriva allar viðmerkingarnar, ið grundgeva uppskot/umsóknir um útreiðsluhækkingar. Sum heild kann tó sigast, at flestu hækkingar hava samband við nýggju úthúgvingarnar, sum skotnar eru upp í áliti mars 1986 um Fróðskaparsetur Føroya (sí hjá-

lagda evnisyvirlit og samandrátt).

Vit loyva okkum í fyrstu atløgu at vísa til hetta skjal, sum varð handað landsstýrinum í heilum líki 17. apríl 1986, men vit vilja sjálvandi allarskjótast til ber koma við kravdu viðmerkingunum til figgjarætlanaruppskotið, sum tað fyriliggur her.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Rakstrarstað nr. 15755 Uppskot til figgjarlóg 1987

		Roknskapur 1.4-31.12 1985	Játtan 1986	Uppskot viðm. 1987	kr. (1000) Uppskot landss. 1987
83904	Ymiskar inntøkur	(22.5)	(30.0)	(30.0) 1)	(30.0)
103127	Løn - lærarar	420.1	740.0	1,088.5 2)	1,088.5
103143	Løn - starvsfólk	1,038.3	1,586.0	1,787.0 3)	1,787.0
103168	Løn - sáttmálalønt	1,955.2	3,730.0	5,041.1 4)	5,041.1
103288	Løn - onnur	82.5	100.0	278.0 5)	278.0
103509	Samsýningar	115.7	100.0	161.0 6)	161.0
	Løn/sams. samant.	3,611.8	6,256.0	8,355.6	8,355.6
113202	Ferð- og dagp. innl.	17.3	15.0	26.3	26.3
113638	Útlanl. Fróðskap.s.	126.0	100.0	331.0	331.0
123103	Skeið	19.0	15.0	26.0	26.0
123136	EDV-skeið	0.0	0.0	6.0	6.0
133053	Fólkatrygging	8.8	9.0	9.0	9.0
203308	Lýsingar	43.3	30.0	45.0	45.0
203403	Dagblað, tíðarrit v.m.	11.8	20.0	26.5	26.5
213408	Umvælingar v.m.	14.0	20.0	16.2	16.2
213503	Umsiting	31.4	60.0	40.0	40.0
213806	Leiguútreiðslur	136.4	200.0	212.0	212.0
233051	Innbúgv	65.7	70.0	100.9	100.9
233155	Prentlutir	38.8	30.0	51.8	51.8
233259	Postgjald	26.5	35.0	37.3	37.3
233354	Telefon og telex	52.5	80.0	86.3	86.3
233553	EDV-tól k. mejr 5000	0.0	0.0	95.0	95.0
233561	Aðrar skrivsútr.	35.8	50.0	60.6	60.6
233703	EDV-tól leig. og um. serv)	0.0	0.0	30.0	30.0
233711	EDV-for. keyp+leiga	0.0	0.0	51.0	51.0
233728	EDV serkøn hjálp	0.0	0.0	12.0	12.0
233736	EDV uttah. koying.	0.0	0.0	0.0	0.0
233744	EDV aðrar útreiðs.	0.0	0.0	10.0	10.0
253085	Bókak. og innbind.	63.1	110.0	184.7	184.7
253306	Umboð	180.1	110.0	437.4	437.4
253314	Aðrar útreiðslur	84.0	100.0	50.0	50.0
253903	Aðrar útreiðslur	81.8	108.0	266.7	266.6
	Aðrar útreiðs. tils.	1,036.3	1,62.0	2,211.7 7)	2,211.7
	Alt samantalt	4,625.6	7,388.0	10,537.3	10,537.3

Hjálagt: Býtið av upphæddum út á setursskrivstovunu og deildir (1 bls.)x)
Viðmerkingar 1-7 (6 bls.)x)
Skjal II viðv. støvum (1 bls.). — Víst verður til serskjal:
Starvsskipan og lønir pr. 1.1.86.

x) til skjals á landsskrivstovuni

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Rakstrarstað nr. 15755 Uppskot til figgjarlóg 1987

		Samanlega	SSS	GFD/SSD	FMD	STØ	SVD	GS
83904	Ymiskar inntøkur	(30.0)	(30.0)	0.0	0.0	0.0		
103127	Løn - lærarar	1,088.5	523.0	197.5	43.0	325.0		
103143	Løn - starvsfólk	1,787.0	733.3	80.0	576.6	327.1	70.0	
103168	Løn - sáttmálalønt	5,041.1	100.0	547.9	1,682.0	1,975.0	375.0	361.2
103288	Løn - onnur	278.0	24.0	180.0	60.0	14.0		
103509	Samsýningar	161.0	96.0	10.0	30.0	25.0		
	Løn/sams. samantalt	8,355.6	1,476.3	1,051.4	2,391.6	2,666.1	445.0	361.2
113202	Ferða- og dagp. innland.	26.3	10.0	8.0	6.3	2.0		
113538	Uttanlandsf., Fróðs.	331.0	22.0	60.0	69.0	170.0		10.0
123103	Skeið	26.0	6.0	5.0	15.0	0.0		
123136	EDV-skeið	6.0	0.0	6.0	0.0	0.0		
133053	Fólkatrygging	9.0	9.0	0.0	0.0	0.0		
203308	Lýsingar	45.0	45.0	0.0	0.0	0.0		
203403	Dagblø, tíðarrit v.m.	26.5	4.0	5.0	13.5	4.0		
213408	Umvæl ingar v.m.	16.2	3.0	0.0	8.2	5.0		
213503	Umsiting	40.0	0.0	0.0	0.0	40.0		
213806	Leiguútreiðslur	212.0	20.0	0.0	72.0	120.0		
233051	Innbúgv	100.9	10.0	40.0	35.9	15.0		
233151	Prentlutir	51.8	40.0	3.0	3.8	5.0		
233259	Postgjald	37.3	25.0	2.0	5.3	5.0		
233354	Telefon og telex	86.3	25.0	10.0	26.3	25.0		
233553	EDV-tól keyp kr. 5000	95.0	60.0	35.0	0.0	0.0		
233561	Aðrar skrivstovuútg.	60.6	15.0	10.0	23.6	12.0		
233703	EDV-tól leiga og umvæl.	30.0	0.0	0.0	0.0	30.0		
233711	EDV-forrit keyp og leiga	51.0	15.0	6.0	15.0	15.0		
233728	EDV serkøn hjálp	12.0	5.0	2.0	5.0	0.0		
233736	EDV uttanhýsis koyring	0.0	0.0	0.0	0.0	0.0		
233744	EDV aðrar útreiðslur	10.0	0.0	0.0	0.0	10.0		
253085	Bókakeyp og innb.	184.7	4.0	41.0	64.7	75.0		
253306	Amboð	437.4	15.0	10.0	12.4	400.0		
253314	Aðrar umsitingarútg.	50.0	0.0	0.0	0.0	50.0		
253903	Aðrar útreiðslur	266.7	50.0	4.0	55.7	2.0	155.0	
	Aðrar útg. samantalt	2,211.7	383.0	247.0	431.7	985.0	155.0	10.0
	Alt samantalt	10,537.3	1,829.4	1,262.4	2,823.3	3,651.1	600.0	371.2
	Játtan 1986:	7,388.0						
	er býtt soleiðis:		1,496.9	578.9	2,844.1	2,128.1	0.0	340.0

SSS: Setursskrivstovan
GFD/SSD Gudfrøði-, søgu og siðsøgudeild
FMD: Føroyamálsdeild
STB: Stødisútbúgving
SVD: Samfelagsvísingdadeild
GS: Granskingaryrkir

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA — RAKSTRARSTAÐ 15755

103143 Løn / starvsfólk	Setursskrivstovan	.....733.3
	Føroyamálseildin	.....576.6
	Støðisútbúgingin	.....252.1
	tilsamans	.....1.562.0
103168 Løn / sáttmálaløut	Føroyamálsdeildin	.....1.682.0
	Støðisútbúgingin	.....1.224.6
	Guðfrøði-, søgu- og síðsøgudeild	.....547.9
	Granskingarstyrkir	.....361.1
	tilsamans	.....3.815.6

Uppskot til fíggjarætlan 1987

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA — RAKSTRARSTAÐ 15755

Starvsskipan og lønir pr. 1.1.1986

103143 Løn og starvsfólk

Árslønir 1987 sbrt. sáttmála 1.10.84 + 1,5 % frítíðargjald og 5,5% eftirlønargjald av 1986-lønum.

Setursskrivstovan

1. Setursskrivari í 34. lønarflokki		
1.12.85 og seinasta stigi	221.574.00	
+ 5,5% eftirlønargjald	12.186.57	233.760.57
2. Assistentur í 12. lønarflokki		
(1.4.87 á 11. stigi)	151.625.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	8.339.37	159.964.37

3. Assistendur í 9. lønarflokki		
(1.9.87 á 8. stigi)	140,468.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	7.725.74	148.193.74
4. Yvirassistendur í 15. lønarflokki		
(1.12.85 á 11. og sein. stigi(	170.670.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	9.386.85	180.056.85
Starvsfólk 1, 2, 3 og 4 (tils. 4 støv		
+ 1,5 % fritíðargjald av 1986-lønum		
mett eftir játtan 1986		11.250.00
Setursskrivstovan tilsamans		733.225.53
Føroyamálsdeildin		
5. Assistendur í 9. lønarflokki		
(1.4.80 á 14. og seinasta stigi	153.318.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	8.432.49	161.750.49
6. Assistentur í 9. lønarflokki		
1.9.80 á 14. og seinasta stigi		
— 1/2 starv	76.659.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	4.216.25	80.875.25
7. Assistentur í 9. lønarflokki		
(á seinasta stigi)	153.318.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	8.432.37	163.455.37
Starvsfólk 5, 6, 7 og 8 (tils. 3,5 støv)	567.831.60	
+ 1,5 % fritíðargjald av 1986-lønum,		
mett eftir játtan 1986		8.745.00
Føroyamálsdeildin tilsamans		576.576.60

Støðisútbúgvingin

9. Assistentur í 12. lønarflokki		
(1.4.87 á 9. stigi)	154.778.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	8512.50	163.285.50
10. Laborantur í 12. lønarflokki		
(1.8.81 á 12. og seinasta stigi		
- 1/2 starv)	80.517.00	
+ 5,5 % eftirlønargjald	4.428.44	84.945.44
Starvsfólk 9 og 10 (tils. 1,5 starv)		248.230.94
+ 1,5 % frítíðargjald av 1986-lønum,		
mett eftir játtan 1986		3.795.00
Støðisútbúgvingin tilsamans		252.025.94
LØNIR/STARVSFÓLK TILSAMANS		1.561.828.07

103 168 Løn/sáttmálaløn

Føroyamálsdeildin

1. 1 lektari í málfrøði og orðabókaritstjóri	
(1.7.80 á 15. ári, t.e. seinasta stigi)	
a) Bruttoársløn sbrt. sáttm. frá okt. 1985	229.032.34
b) 2 eyka dýrtíðarviðbetur á 1248	2.496.000
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya Landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	22.664.50
	286.692.84
2. 1 lektari í fólkaminnisfrøði og innsavningarleiðari	
(lønaraldur frá 1.1.62, t.e. seinasta stigi)	
a) + b) + c) + d) sum starv 1	286.692.84

3. 1 adjunktur í bókmentum	
(1.4.87 á 9. ári)	
a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	190.849.77
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	18.754.26

4. 1 adjunktur í málsfrøði	
(1.4.87 á 9. ári)	
a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	190.849.77
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya Landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	18.754.26
	244.600.03

Sáttmálaløn 1, 2, 3 og 4	1.062.585.74
+ 1,5 % frítíðargjald av 1986 lønum (útroknað í mun til játtan 1985 - 10 % eftirlønargjald — mett)	14.344.90

5. og	
6. Víst verður til játtan 1986 —	
størvini enn ikki sett	605.000.00
Føroyamálsdeildin tilsamans	1.681.930.64

Støðisútbúgvingin

7. 1 lektari í stødd/hag/dátufrøði	
(1.8.83 á 15. ári, t.e. seinasta stigi)	
a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	229.032.34
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya Landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	22.664.50
	286.692.84

8. 1 adjunktur í alisfrøði
(1.4.87 á 8. ári)

a) Bruttoársløn sbrt. sáttm. frá okt. 1985	185.506.50
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	18.207.06
	238.709.56

9. Í lektarastarv í livfrøði (frá 1.10.80 er full ábyrgd og undirvísingarskylda knýtt at fólki á Náttúrugripasavninum. Afturfyri rindar setrið løn til cin savnvørð.)
(1.2.84 á 15. ári, t.e. seinasta stigi)

a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	229.032.34
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya Landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	22.664.50
	286.692.84

10. 1 lektari í evna-/livfrøði
(1.7.87 á 14. ári)

a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	217.474.56
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya Landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	21.503.58
	273.974.14

sáttmálaløn 7, 8, 9 og 10	1.086.069.38
+ 1,5 % frítíðargjald av 1986 lønunum (útroknað í mun til játtan 1986 + 10 % eftirlønargjald — mett	18.495.00
	1.104.564.38

11. Tíðaravmarkað starv í støddfrøði/alisfrøði, 1.8.86-31.7.87 — mett	120.000.00
Støðisútbúgvingin tilsamans	1.224.564.38

Gudfrøði-, søgu- og siðsøgudeild

12. 1 lektari og leiðari
(á seinasta stigi í sáttm.)

a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	237.119.65
c) Viðbót eftir avtalu við Føroya landsstýri	32.500.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	23.712.00
	293.331.64
+ 1,5 % frítíðargjald — meting	4.500.00
	297.831.64

13. Starv í søgu frá 1.8.1986 — mett 250.000.00

Gudfrøði-, søgu- og siðsøgudeild tilsamans 547.831.64

Granskingarstyrkir

12) Roknað verður við 2 magistaralønum á 3. ári uttan viðbót

a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	160.678.09
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	16.067.80
	179.241.89
a) Bruttoársløn sbr. sáttm. frá okt. 1985	160.678.09
b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248	2.496.00
d) Landskassans 10 % av eftirlønargjaldinum	16.067.80
	179.241.89
+ 1,5 % frítíðargjald — mett	2.688.63
Granskingarstyrkir tilsamans	361.172.41

LØN/SÁTTMÁLALØNT TILSAMANS 3.815.499.07

Að § 15 - 15793 Stovnarnir á Debesartrøð
sbrt. skriv dagfest 6. juni 1986:

Hjálagt verður við góðkenning stovnanna, send landsstýrinum uppskot til fíggjarætlan 1987 fyri rakstrarstuð 15793: Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur).

Uppskotið er samskipað av setursskrivstovuni, ið sum kunnugt hevur umsitingina av felagsrakstrinum um hendur.

kr.
(1000)

Kontonummar og navn	Roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landss. 1987
103143 Løn/starvsfólk	116.9	167.0	161.7	161.7
103151 Løn/avloysarar	0.0	13.0	13.0	13.0
103222 Løn/reingerð	217.4	345.0	307.0	307.0
103288 Løn/onnur	96.6	152.0	180.4	180.4
Lønir ialt	430.9	677.0	622.1	(622,1)
213105 El, hiti og vask	288.9	453.5	373.5	373.5
213408 Umvælingar	23.4	25.0	25.0	25.0
213702 Ognartrygging	27.0	28.0	28.0	28.0
213901 Ymsar húsaútr.	13.8	39.5	42.5	42.5
233314 Aðrar skrivst.út.	63.2	85.0	85.0	85.0
253355 Ums. av Debesart.	9.1	20.0	20.0	20.0
253903 Aðrar útreiðslur	15.3	15.0	15.0	15.0
Allar aðrar útr.	440.7	666.0	589.0	(589,0)
Samantalt	871.6	1.343.0	1.251.1	1.251,1

Viðmerkingar til fíggjarlogtingslóg 1987
Rakstrarstað 15793: Stovnar á Debesartrøð.

103143 Løn/starvsfólk: Húsavørður á øllum stovnum og deildum, 9. lfl. 14. stig 161.7

103151 Løn/avloysarar: fyri húsavørðin í sumarfrítíðini 13.0

103222 Løn/reingerð:

5 vaskikonur løntar fyri 3965 tímar/árl.	265.0
Høvuðsreingerð fritíðarp. íroknа 300t	27.5
Avloysarar uml. 200 t/árið	14.5
	307.0

103288 Løn/onnur

Umsjónarmaður sum røkir Debesartrøð fyri arb. m. løn,	150.0
Húsavarðarhjálp uml. 320 tim/ár.	20.0
Maður, ið hevur flaggingina undir hond fyri fasta samsýning	2.4
Ørindafólk til allar stovnar á Deb. trøð	8.0
	180.4

213105 El, hiti og vask:

El: felagsmátari fyri alla nýtslu	
— Fornminniss., Støðisúth. og Landsbókas:	
kW-gjald	3.5
150.000 kWt á (1,21)	180.0
Støðisúthúgvingin	30.0
Hiti: 70.000 litrar á (2,00)	140.0
Vaskiamboð og -evni	20.0
	373.5

213408 Umvælingar (útr. sum illa fáast liðaðar sundur millum stovnarnar + amboð) 25.0

213702 Ognartryggingar (brunatrygging) 28.0

213901 Ymsar húsaútreiðslur:

Kloakkreinsing og viðlíkahald	5.000
Kaminreinsing (øll húsini)	2.500
Oljufýrs- og hitastýringsrøkt	12.000
Viðlíkahald av fløggum og flaggstong	2.000
Náttarvakt	18.000
Óvæntaðar útreiðslur	3.000
	42.5

233561	*Aðrar skrivstovuútreiðslur:* Leiga og nýtsla av 2 ljóstøkutólum til allar stovnar uttan landsskjalasavnið og Landsbókasavnið	85.0
253355	*Umsiting av Debesartrøð:* Planting og tilfar til at halda trøðna í góðum standi	20.0
253903	*Aðrar útreiðslur*	15.0
	Samantalt	1.251.1

Að § 15 - 15805 Heilsufrøðiliga starvsstovan
Sbrt. skriv dagfest 12. juni 1986:

Viðmerkingar til fíggjarlógaruppskotið fyri 1987.

Vísandi til bræv frá Føroya Landsstýri dagf. 23/4-86 [F. L. j.nr. 400-40] viðvíkjandi fíggjarlóg, senda vit við hesum uppskot um fíggjarlóg fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna fyri fíggjarárið 1987.

Uppskotið er gjørt sambært tær reglur bræv við ásetur, og eru viðmerkingar gjørdar til allar størri útreiðsluhækkingar og nýnormeringar.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan er í eini rembingartíð. Heilsufrøðiliga Starvsstovan er vorðin sjálvstøðugur stovnur undir Landsstýrinum, og alt fleiri týdningarmikil arbeiðsøkir verða áløgd stovninum at røkja. Bert fyri at nevna nøkur dømir, so fær Heilsufrøðiliga Starvsstovan centralumsitingina av matvorulógini. Heilsufrøðiliga Starvsstovan er vorðin 2. kærustovnur í heilsumálum, álagt er Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at gera umfatandi dálkingarkanningar í samabd við aling osfr.

Fíggjarlógaruppskotið er gjørt við hesum nýggju arbeiðsøkjum fyri eyga, um framt at núverandi arbeiðsøkir so sum eftirlit við fiskavirkjum og -skipum og fiskasjúkur verða ment samsvarandi teimum øktu arbeiðsuppgávum á hesum økjum.

Dálkingarkanningarnar í samband við aling er eitt øki, Heilsufrøðiliga Starvsstovan fer at seta í gongd av álvara nú. Til hetta krevst eitt fólk við akademiskari útbúgving (t.d. kemi), sum skal leiða hetta arbeiðið dagliga og 1 1/2 laborantur til starvsstovuarbeiði.

Fyri at farast kann av álvara undir matvørulógararbeiði, er neyðugt at settur verður ein djóralækni, ið skal taka sær av teimum veterineru spurningunum í hesum sambandi. Her verður serliga hugsa um kjøteftirlit og líknandi.

At Heilsufrøðiliga Starvsstovan er verðin 2. kærustovnur í heilusmálum, økt tal av málsviðgerðum innan fiskavirkir og -skip, innan alivinnuna og málsviðgerðir innan matvørurnar annars seta kruv til at juristur ella líknandi verður settur til hesi endamál.

Eitt týdnigarmikið lið í øllum hesum arbeiði, er eftirlitið á staðnum. Til hetta arbeiðið verður søkt um játtan til ein matvøruteknikara afturat. Eftirlitið á staðnum tekur sær av matframleiðsluni á fiskvirkjum og -skipum, samstundis sum tað inngongur sum eitt týdningarmikið lið í uppbyggingini av matvørulógareftirlitinum.

Við øllum hesum øktu arbeiðsøkjum í huga, skuldi tað verið eyðsýng og vit meta tað verað neyðugt, at settur verður stjóri á Heilsfrøðiligu Starvsstovuni. Vit meta tað vera neyðugt við stjóra beinanvegin, so hann kann vera við í uppbyggingini av teimum nýggju arbeiðsøkjum Heilsufrøðiliga Starvsstovan fer undir. Stjórin verður tað koordinerandi liðið á stovninum, og saman við teimum trimum deildarleiðarunum kemur hann at stýra øllum teimum rættiliga ymisku arbeiðsuppgávunum, stovninum er álagt at røkja.

103143 Løn - starvsfólk

Laborantar
Neyðugt er at seta 3 laborantar/laboratoriuteknikarar í sambund við tey nýggju starvsøkini, sum lýst er omanfyri.

Í skrivstovufólk
Setanin av nýggjum djóralækna, akademikara til dálkingarkanningar og máls-

viðgerara kemur at krejva fleiri storv á skrivstovuni, og vilja vit ti sokja um at fáa eitt skrivstovustarv normering.

1 teknikari
Samsvarandi øktu uppgávunum innan eftirlit við fiskavirkjum og - skipum og byrjanini av uppbyggingini av matvørulógini, verður søkt um normerað til ein matvøruteknikara. Saman við ti setta teknikaranum verður arbeiðsøkið: Eftirlit á staðnum við fiskavirkjum og skipum, eftirlit á staðnum við allari matvørufamleiðslu annars og í sambond við uppbygging av matvørulógini at gera neyðugar registreringar.

1/2 uppvaskifólk
Vegna nógv økta starvsstovuarbeið, er neyðugt burturav at hava fólk til dagligt uppvask av starvsstovuútgerð.

103168 Lon - sáttmálalon

Stjóri
Sambært løgtingslóg nr. 23 frá 13. mars 1986, er Heilsufrøðiliga Starvsstovan vorðin ein sjálvstøðugur stovnur, ið skal leiðast av egnum stjóra. Tað skuldi ikki verið neyðugt at borið fram prógvgrundir fyri, at setan av einum stjóra er altavgerandi fyri, at ein stovnur við so víttfevnandi starvsøki kann virka til fulnar. Nevnast skal, at vantandi leiðsla av stovninum í síni heild í sera stóran mun hevur nervað og ørkymlað arbeiðið á staðnum. Ein fortreytin fyri seta av fleiri fólkum á stovninum er ti, at stjóri verður settur.

1 djóralækni
Tað er bráðneyðugt at seta ein fiskadjóralækna afturat á Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Hesin skal taka sær av fiskasjúkum sum heild, arbeiða viðari við uppbyggingini av einum veterinerum eftirliti innan alingina, gera veterinær lógaruppskot aling viðvíkjandi og annars vera til hjálpar á fiskadeildini sum heild.

I djóralækni
Sambært álitið viðvíkjandi matvørulógini frá 1981 varð m.a. nevnt, at tað umframt verandi ekspertisu á Starvsstovuni skuldi setast ein djóralækni í sambandi við, at veterinæri parturin av matvøreeftirlitinum verður settur í verk. Um vit gera okkum hugsanir at farast skal undir hetta sera áðrokandi økið, er neyðugt at hesin verður játtaður.

I juristur (málsviðgerð)
Sum nú er, er ongin málsviðgerð á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, og hava vit verið noydd at dúva uppá arbeiðskraft frá Landsstýrisitingini. Hesar uppgávur eru stórar og koma at veksa nógv í tráð við, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan er vorðin 2. kærustovnur í heilusmálum samstundis sum uppbygging av neyðugari málsviðgerðarproseduru er neyðug í matvørulógini. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur ferð eftir ferð munnliga og skrivliga gjørt Landsstýrið vart við hendan tørv.

I kemikari
Kemikari til nærkanningar av dálking við alibrúk.
Í fjør vórðu av Føroya Landsstýri játtaðar kr. 800.000 til dálkingarkanningar av alibrúki, men vísti tað seg seinni, at peningurin ikki var ávístur á nakrari konto. Á fundi við umboð fyri Føroya Landsstýri (Kjartan Hoydal) og fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna varð gjørt av, at søkjast skuldi um nevnda kanningarpening á fíggjarlógaruppskoti okkara fyri 1987.

233051 Innbúgv
Vitandi um, at hølini verða víðkaði í næstum, er neyðugt við figging av innrætting av nýggju hølunum:

23.5.30-4 Telefon og telex
Av tí at Heilsufrøðiliga Starvsstovan ongan hevur bráðan tørv fyri skjótum skrivligum boðum uttanífrá eins og úteftir frá stovninum, er neyðugt at hava telex/telefax. Sum dømi um hetta kann nevnast, at Starvsstovan er við í »Nordic hot food line«, ið beinleiðis krevur telex ella telefax, um ymiskir áðrokandi upplýsingar matvørum viðvíkjandi skulu vera stovninum í hendi sum skjótast.

253306 Amboð
Vegna øktu uppgávur okkara er sjálvsagt neyðugt at gera eyka iløgur sum t.d.:

— »Feltútgerð« til dálkingarkanningar (bátur og viðfestur vognur)

— toldútgerð

— Viðkan av HPLC (High Pressure Liquid Chromatography)

253936 Laboratoriurakstur
Samsvarandi økta starvsstovuarbeiðið og serliga í samband við dálkingarkanningar, kann roknast við einari størri øking í rakstrarútreiðslunum.

Viðlagt: Skjal I og skjal II x)

x) Til skjals á Landsskrivstovuni.

Talvan kemur á næstu síðu!!!!

kr.
(1000)

Kontonummar og navn R 15805	Roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landss. 1987
83904 Ymiskar inntøkur	— 343,7	— 500,0	— 500,0	— 500,0
103143 Løn - starvsfólk	603,9	1.306,0	2.145,0	1.701.0
103151 Løn - avloysarar	102,1	76,0	80,0	80,0
103168 Løn - sáttmálaløn	500,6	902,0	2,128,6	955,0
103288 Løn - onnur	42,5	43,0	45,0	45,0
103405 Løn - úrtíðarløn	6,1	32,0	34,0	34,0
113202 Ferða- og dap. innl.	31,4	60,0	63,0	63,0
203308 Lýsingar	23,8	30,0	40,0	40,0
213503 Umsiting	1,0	10,0	95,0	95,0
213702 Ognartrygging	0,0	10,0	10,0	10,0
233051 Innbúgv	60,0	30,0	60,0	60,0
233155 Prentlutir	55,5	30,0	40,0	40,0
233259 Postgjald	12,1	25,0	27,0	27,0
233354 Telefon og telex	36,8	60,0	75,0	75,0
233504 Sakkøn hjálp	14,0	15,0	20,0	20,0
233561 Aðrar skrivst.út.	11,1	20,0	25,0	25,0
253085 Bókakeyp og innb.	37,2	45,0	49,0	49,0
253306 Amboð	104,1	600,0	900,0	800,0
253371 Rannsóknir	39,6	60,0	63,0	63,0
253903 Aðrar útreiðslur	39,8	134,0	136,0	136,0
253928 Tænastu. rakst.	184,2	300,0	65,0	65,0
253936 Laboratoriuskstur	187,2	350,0	500,0	400,0
Í alt	1.751,1	3.638,0	6.100,6	4.283,0

Vísandi til telefonsamrøðu okkara millum hin 3. juli 1986 verður hervið biðið um fylgjandi broyting í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna fyri tíðarskeiðið 1987:

Kontonummar 213503 Umsiting — skal broytast frá kr. 15.000,- til kr. 95.000,-

Orsøkin til hetta er, at vit skulu nýta kr. 80.000,- eyka til keyp av automatiskum stýrigreiðum til ventilatiónsúbúnaðin og ymiskar neyðugar umvælingar av hitaskipanini.

Samlaða upphæddin fyri stovnin verður sostatt	kr. 6.100.600,-
og ikki sum áður	kr. 6.020.600,-

Vinarliga gera hesa broyting sum skjótast, so hon ikki dettur burtur imillum.

Að § 15 - 15907/322012 Barnablað
Sbrt. skriv dagfest 3. juni 1986:

Uppskot til fíggjarløgtinglóg fyri 1987 viðvíkjandi »**Barnatíðindi**« eftir ætlandi rakstri 1986.

Inntøkur:	
Lýsingar, blaðhald, søla	kr. 23.000-
Studningur	kr. 7.500-
Útreiðslur:	
Prenting, tilfarsrit o.a.	kr. 10.000-
Postgjald, box o.a.	kr. 2.000-
Telefon	kr. 1.200-
Reingering, ljós, hiti	kr. 8.000-
Annað	kr. 800-
Samsýning	kr. 8.500-
	kr. 30.500

Ókeypiseintøk verða send teimum lýsandi,
Ókeypiseintøk verða send skúlabørnum,
Ókeypiseintøk verða send sjúkrahúsum.
Haldarar: 200, haldaragjald kr. 30-um árið.

Viðvikjandi ætlan fyri komandi ár, so verður hon lutfalsliga tann sama sum í ár — ætlandi lítil og eingin broyting.

Að § 15-15907/323012: Barnabladið

Kontonummar og navn BARNABLADID	Roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987
§ 15 - 15907/323012	hjálagt	37.500	100.000

Barnablaðið fekk seinasta fíggjarár kr. 37.500 í stuðuli. Hetta er ikki nógv, tí undirskotið er stórt, og hetta tyngir um arbeiði hjá Bókadeildini. Niðanfyri er fíggjarætlan gjørd fyri 1987, og sæst her støðan. Vit hava í ár hækkað løni na til blaðstjóra, tí tað er ikki minni arbeiði at vera blaðstjóri á einum barnablað enn á einum hvørjum øðrum blað.

Bókadeildin søkir um stuðul til BARNABLADID og skýtur upp, at stuðulin á fíggjarlógini 1987 verður hækkaður til kr. 100.000. Hendan upphædd vildi hjálpt okkum til eisini at gjørt eitt vakrari blað, og hetta hevði ført við sær fleiri haldarar.

Vónandi verður umsóknin viðgjørd við vælvild.

Fíggjarætlan fyri 1987 fyri 15907/323012 (BARNABLADID)

Inntøkur:

Haldaragjald 75 × 2830	212.250
Lýsingar	24.000
	236.250

Útreiðslur:

Prenting og hefting 12 × 20.000	240.000
Umsiting	16.000
Løn til blaðstjóra 12 × 3.500	42.000
Samsýningar (upphavsrættur, umsetarar løn til rithø. og teknarar o.s.fr.)	50.000
	348.000

Viðmerkingar landsstýrisins:

Uppskot landsstýrisins er at játta 50.000 kr. til bæði blaðini, soleiðis:

Til »Barnatíðindi« verður játtað	kr.	8.500
Til »Barna- & Ungdómsblaðið« verður játtað	kr.	41.500

Ad § 15 - 15907/323037 Sjónleikur
Sbrt. skriv dagfest 5. juni 1986:

Meginfelag áhugaleikara Føroya takkar fyri stuðul í hesum fíggjarári og loyva vit okkum við hesum at søkja um 355.000,- kr. úr landskassanum fyri fíggjarárið 1987 sambært hjáløgdu fíggjarætlan.

MáF hevur 9 limafeløg sum er og tað 10. er í ferð við at verða stovnað í hesum døgum. Limafeløgini eru: Havnar Sjónleikarfelag, Klaksvíkar Sjónleikarfelag, Kvívíkar Sjónleikarfelag, Stranda Sjónleikarfelag, Virkið á Sandi, Royndin í Nólsoy, Eydnan á Oyrabakka, Hvalbiar Sjónleikarfelag og Tvøroyrar Sjónleikarfelag. Sjónleikarafelagið í Vági er í ferð við at verða stovnað og fer vantandi í hesum árinum at søkja um limaskap í MáF. Onkur einstaklingur hevur eisini meldað seg sum lim í MáF.

Viðvíkjandi virksemi felagsins vísa vit til hjáløgdu frágreiðing fyri árið 1985.

MáF hevur seinru árini gjøgnum NAR (Nordisk Amatørteaterråd havt neyvt samstarv við hini norðanlondini. Hetta samstarv hevur m.a. verið skeiðvirksemi, sjónleikarfestivalir og annað, bæði burturi og her í Føroyum, og hetta hevur ført við sær — sum ætlanin eisini er — økt virksemi og øktan áhuga og innblástur hjá limunum um alt landið, og nevndin er vorðin greið yvir, at størri torvur stendst m.a. av, at limafeløgini alt meira biðja um konsulentbetnastu, og hetta er kostnaðarmikið av ti at vit noyðust at senda fólk út á bygdirnar í stytri

og longri tíðarskeið.

Eitt úrslit av hesum skjótt vaksandi virksemi er eisini tørvurin á peningi til eina skipaða fyrisiting, ið er avgerandi neyðug fyri at halda øllum hesum gangandi.

MáF-tíðindi, ið kom út seinast desember 1984 hava vit m.a. av fíggjarligari trongstøðu verið noydd at steðga fyribils, men av teirri orsøk, at eitt tílíkt lima- og tíðindablað sum hetta hevur alstóran týdning fyri sambandið, trivnaðin og framhaldandi virksemi hjá limafeløgunum og eisini úteftir til almenningin, metir nevndin í MáF tað vera neyðugt at taka upp aftur útgávuna av blaðnum, men sum nevnt velst hetta m.a. um fíggjarstøðuna.

Í sambandi við at NAR hevur ráðsfund í Reykjavík í juni 1986, har Føroyar eisini vera við, fer nevndin í MáF at hava samráðingar við stýrið í NAR um møguleikarnar fyri at fáa lærarakreftir til Føroya várið og heystið 1987 at hava skeið í m.a. »Klovnarí og mimu«, »Sort teater« v.m. Ætlanin er eisini at hava skeið við tí tekniska fólkinum sum er knýtt at sjónleikinum í Føroyum, t.e. ljós- og ljóðfólk. Tað krevst stórt innlit í nýggja teknikkin, ið sum kunnugt er í støðugari framgongd, og hesi amboð eru ómetaliga týdningarmikil í nútímans sjónleikarvirksemi.

Royndir okkara eru, at skal leiklistini vera lív lagað, verða vit framhaldandi at arbeiða við tiltøkum, sum stýðja hesa listagrein og vilja vit royna at styrkja og styrkja feløg, eins væl og einstaklingar, ið, sum vit øll vita, leggja almikið arbeiði og stórar kreftir í hesa list, og sum kunnugt er øll hendla megin ókeypis.

Vit vóna um vælvild og góða undirtøku sendir felagið inn hesa umsókn um stunding fyri 1987 upp á kr. 355.000,-.

Sbrt. skriv frá Grímu, dagfest 30. juni 1986:

Vit vilja við hesum senda tykkum umsókn okkara um stuðul fyri fíggjarárið 1987. Stuðulin í ár var 165.000 kr. í okkara part. Vit fara at heita á Landsstýrið um at hækka hesa upphædd til 1000.000 krónur í 1987.

Grundgevingar okkara fyri eina so munandi hækkan kunnu lesast í hjáløgdu umsókn frá 16. september í fjør, ið varð send Løgtingsins Fíggjarnevnd og Føroya Landsstýri. Fíggjarætlanin í hesi umsókn, sum var fyri fíggjarárið í ár ljóðaði upp á 800.000 kr. Men onkrir postar í henni eru ov lágt settir; íløgukontoin, t.d., er alt ov lág og kostnaðurin av at halda egin høli og lønarútreiðslurnar vera hægri í 1987, enn mett var á heysti í fjør.

Umframt tær viðmerkingar, sum eru í hjáløgdu umsóknini, hava vit serliga eitt at leggja afturat, sum vit meta hevur stóran týdning. Vit fara at heita á Landsstýrið um at broyta játtanina í fíggjarlógini til sjónleik í Føroyum, soleiðis

at tað í framtíðini vera tvær ymiskar játtanir: **ein til yrkisssjónleik og ein til áhugasjónleik.** *Í løtuni er ein felagsjáttan, sum Mátt (Meginfelag Áhugaleikara Føroya) og Grima byta sínámillum. Hendan skipan skapar eina ábyrgamótsetning millum felagsskapirnar; sum hvørgin parturin ynskir ella hevur gagn av.*

Vit vóna at Føroya landsstýri gongur ynskum okkara á møti. Um okkurt er, ið tit ynskja útgreinað — viðvíkjandi umsóknini ella Grima sum heild — koma vit tegin á ein fund og greiða tykkum nærri frá sjónarmiðum og avlopum okkara.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er at játta kr. 450.000,- til sjónleik

---

Ad § 15 - 15907/323053 Útgáva av barnabókum

Bókadeild Føroya Lærarafelags søkir um studning til barna- og ungdómsbøkur á fíggjarlógini 1987.

Stundingurin í ár var kr. 650.000, og verður søkt um somu upphædd fyri árið 1987.

Bókadeildin arbeiðir fyri at útvega føroyskar bøkur, sum í framtíðini skulu vera kappingarførar við tær donsku, sum børn og ung lesa nógv av.

Av eini uppteljing gjørd á skúlabókasavni sæst, at minni enn 1/5 av útláninum eru føroyskar bøkur. Eisini hava børn, ið hava lesibug, lisið allar føroyskar barnabøkur longu á 11-12 ára aldri. Støðan er álvarsom.

Bókadeildin hevur til prentingar í ár 15 bøkur umframt 14 myndabøkur, sum helst allar fara í tann nýstovnaða BARNABÓKAKLUBBAN.

Stundingur varð latin at stovna ein Barnabókaklubba í 1986. Stundingurin kr. 250.000 ynskir Bókadeildin at fáa aftur á fíggjarlógina í 1987, bíðast hann varð biðin um sum ein eingangsstundingur. Deils er alt so nýtt við einum bókaklubba í Føroyum, so eingin veit, hvussu tiltakið fer at eydnast, deils eru vissar umsitingarútreiðslur av honum. Bøkurnar í bókaklubbanum verða seldar 1/3 bíligari enn í bókabúðunum, so ikki kann roknast við vinningi tey fyrstu árini.

Vónadi skilja teir játtandi myndugleikarnir støðuna og viðgera umsóknina við vælvild.

Kontonummar og navn Bókadeild Føroya Lærarafelags	Roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landsst. 1987
15907/323053	x) hjálagt	650.000	650.000	650.000
Barnabókaklubbi		250.000	250.000	250.000
			900.000	900.000

x) til skjals á landsskrivstovuni

Að § 15 - 323116 Føroya Skúlabókagrunnur
Shrt. skriv dagfest 30. mai 1986:

Eftir at skúlabókanevndin í samráð við landsskúlastjóran hevur mett um væntandi útreiðslur fyri fíggjarárið 1987, vil skúlabókanevndin heita á landsstýrið um at seta á fíggjarløgtingslógina sum stundingsveitan til Føroya Skúlabókagrunn 3.600.000,- kr.

Viðlagt verður sent:
1. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1987.

2. Skjal I.

3. Skjal II.

4. Yvirlit yvir útkomnar bøkur 1/4 - 31/12 1985.

5. Yvirlit yvir útgávur, sum eru latnar prentsmiðju.

6. Roknskapur 1/4 - 31/12- 1985.

1. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1987.

1. Til bókaútgávu	3.100.000 kr.
2. Renta av kassakreditti	85.000 kr.
3. Leiga av skristovu- og goymsluhøli	80.000 kr.
4. Innbúgv, lýsingar, bókakeyp, telefon, porto, el oa.	130.000 kr.
5. Tryggingar	30.000 kr.
6. Lønir og samsýningar til formann, kassameistara, skrivstovufólk, nevndarfundir, reingerð o.a.	525.000 kr.
7. Niðurskurður á konto til millumrokning við landskassan	550.000 kr.
	4.500.000 kr.
8. Inntøka av bókasølu 1987 (ætlað)	900.000 kr.
At søkja um sum stuðulsveitan 1987	3.6000.000 kr.

Viðmerkingar:

Til 1: Um bókaútgávuna er at siga, at grunnurin hevur í løtuni um 30 bøkur (heiti) til prentingar, fleiri teirra eru stórar í vavi og kostnaðarmiklar. Nógv handrit eru búgvin til setingar og verða latin á prentsmiðju í næstum. Landskúlafyrisitingin hevur játtað fleiri lærarum fríloyvi skúlaárið 1986/87 at skriva handrit. Fleiri av hesum handritum verða væntandi latin til prentingar í 1987.

Grunsins virksemi er munandi økt í seinastuni og økist alsamt. Tørvurin á undirvísingartilfari er sum øllum kunnugt stórur. Skal grunnurin røkja sínar skyldur til lítar krevst peningur. Tað er ógvuliga trupult hjá skúlabókanevndini at meta um útreiðslurnar. Tí er umráðandi, at peningur altíð er tøkur í grunninum, tá handritini fyriliggja, so at farið kann verða undir útgávu beinanvegin. Tað er ivaleyst eisini grundtankin, at Føroya Skúlabókagrunnur júst skal vera ein grunnur.

Til 2: Í sambandi við útgávu av føroysku ensku orðabókini, sum Føroya Skúlabókagrunnur í samráð við landsstýrið átók sær at keypa alt upplagið av fyri 700.000 kr., varð grunsins kassakredittur í Føroya Sparikassu hækkaður úr 350.000 kr. til 700.000 kr.

Til 3: Á summi í 1985 varð grunnurin uppsagdur í høli sínum á Lützenstrød 7 og flutti til Hoydalsveg 40, har hann nú hevur skrivstovu- og funarhøli. Avlopsrúmið hevur nevndin latið Bókamiðsøluni til goymslu av parti av grunsins bókum.

Til 4: Nevndin hevur í umbúna at fara undir lýsingartiltøk til tess at fremja søluna av grunsins bókum og soleiðis økja um inntøkur grunsins.

b. Til upplýsandi endamál um trygd á arbeiðs plássinum v.m. er neyðugt við ymiskari útgerð, so sum filmar, videobond overhead-plancher v.m. - ætlaðar útreiðslur ..... kr. 15.000

c) Arbeiðseftirlitið tørvar eina EDB-útgerð til okkara skrásetingararbeiði av virkjum, arbeiðsfólki, tekniskari útgerð, hagtøl yvir vanlukkutilburðir v.m.

Ein komplett EDV-útgerð tillaga okkara serligu uppgávum kann fáast, sambært tilboð fyri kr. 171.090,- og við eini leasingskipan yvir 3 ár fyri kr. 5.995,-/mánaða, svarandi til ..kr. 71.940 /ár

d. Tørvur er á einari miðvísari útbygging av tólum til arbeiðshygiejniskar mátingar. Ætlaðar útreiðslur hertil ..... kr. 35.000

e. Í samband við nýggju deildina í Suðuroy verður tørvur á innbúgvi hertil. Ætlaðar útreiðslur hertil (samanborið við Klaksvík) ..kr. 97.000

Samlaðar útreiðslur fyri konto nr. 23351 ....kr. 239.940

ad konto nr. 233155 Prentlutir: Útreiðslurnar koma at økjast nakað vegna fleiri føroyskar reglugerðir og upplýsandi tilfar ..... kr. 65.000

ad konto nr. 233259 Postgjald. Vegna aktan aktivitet og nógv størri samband við tey valdu tryggdarfólkini úti á virkjum, økjast hesar útreiðslurnar munandi ..... kr. 12.000

ad konto nr. 233354 Telefon. Við tveimum nýggjum deildum vaksa hesar útreiðslur - aetlandi ..... kr. 58.800

ad konto nr. 233504 Sakkan hjálp — óbroytt ..... kr. 12.200

ad. konto nr. 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur øktar nakað vegna fleiri deildir ..... kr. 66.000

ad. konto nr. 253467 Trygdarútgerð. Hesar útreiðslur økjast nakað í mun til tal av eftirlitsfólki ..... kr. 8.700

ad konto nr. 253483 Heilsufrøðiligar mátingar. Hetta er nýggj konto. Arbeiðseftirlitið ger ymiskar mátingar fyri stovnar, virkir v.fl. fyri rokning. Roynt verður at halda javnvág í útreiðslum og inntøkum, men er neyðugt við eini minni upphædd at arbeiða við ..... kr. 2.500

ad. konto nr. 253138. Skeiðvirksemi og onnur upplýsandi tiltøk:

a. Arbeiðseftirlitið hevur seinastu árini koyrt certifikatskeið fyri kranu- og trukk førarar.

Avtala er nú fingin í lag við specialarbeiðaraskúlarnar í Danmark., at kranaførareskeið framyvir verða koyrd hjá teimum, meðan vit halda áfram við at koyra trukkførareskeiðini her heima.

Útreiðslur í hesum sambandi verða aetlandi kr. 101.200,.
Landskassans partur 2/3 av hesum ..... kr. 67.500

b. Skeið fyri trygdarfólk, sum Arbeiðseftirlitið hevur skyldu at geva fráboðu í um

trygd á arbeiðsplássum, økjast nakað vegna fleiri trygdarfólk ..... kr. 45.000

c. Temadagar um ymisk evnir innan arbeiðsumhvørvið. Tað hevur vist seg, at stórur tørvur og áhugi er fyri hesum tiltaki.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 12.500

d. Skeið fyri málarar o.fl., sum nýta epoxy- og polyrethanevnir - óbroytt ..... kr. 22.000

e. Framsýning. Arbeiðseftirlitið hevur luttikið við framsýning av persónligari trygdarútgerð á handilsstovnum, og hava vit fingið prógv fyri tí positiva árini, hetta tiltak hevur - ætlaðar útreiðslur — óbroytt ..... kr. 21.000

f. Upplýsandi tilfar á føroyskum. Useting av útlendskum tilfari, útgávur av einum umhvørvisblaði 3. hvønn mánaða v.m.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 31.500

Samlaðar útreiðslur fyri konto nr. 353138 ... kr. 199.500

Viðv. eykajáttan til fíggjarlógina fyri 1987.
Vísandi til okkara umsókn, dagfest 26.05.86. og svar frá Landsstýrinum dagfest 01.07.86. um eykajáttan til innbúgv á nýggju deildini í Klaksvík, skulu vit sambært nevnda svarskrivi hervið søkja um at fáa umrøddu upphædd, nevniliga kr. 97.205,- við á okkara fíggjarætlan fyri 1987.

Ad § 18 - 18152 Brandvenjingarsteðin við Áir.

Rakstrarstaður 18152 **Skjal 1.**

Kontonummar og navn **Konto nr. 253903**	**Roknsk. 1/4-31/12-85**	**Játtan 1986**	**Uppskt. 1987**	**Uppskt. landsst. 1987**
Føroya Brandssk. við Áir	575.000,-	670.000,-	679.500,-	339.750

Sundurgreining av uppskoti fyri 1987.

Løn støðleiðara	kr. 241.900
Løn hjálparfólk	kr. 169.400
Hiti + el	kr. 62.400
Telefon	kr. 6.800
Nýgerð av vatnveiting	kr. 65.000
Umvæling av luftkompressara	kr. 27.000
Umvæling av maskinhúsi (eldsløkkihúsi)	kr. 75.000
Mátingartól og umvælingaútgerð til roykkavaraútbúnaða	kr. 32.000
Í alt	kr. 679.500

Nevndin fyri Føroya Brandskúla vil hervið heita á figgjarnevndina um at taka *helvtina av nevndu upphædd - nevniliga kr. 339.750,-* við á figgjarlógina fyri 1987, og vilja vit eins og undanfarnu ár søkja tryggingarnar um at figgja hina helvtina.

Að § 18 - 18202 Bilefirlit
Sbrt. skriv dagfest 23. juni 1986.

Evni: Viðmerkingar til fíggjarlógaruppskot fyri 1987.
skjøl: 1. Fíggjarlógaruppskot fyri 1987.
2. Fylgiskriv sent Landsstýrinum 20.8.1985.
3. Fylgiskriv sent Landsstýrinum 12.11.1982.
4. Talva yvir arbeiði sum álagt er stovninum samb. lóg.

Vísandi til omanfyristandandi verður undirritaði at seta fram hesar viðmerkingar.

83904 Ymiskar inntøkur:
Við biltalsvøkstrinum ca. 900 í seinasta ári og við teimum hækkaðu gjøldunum fyri koyriroyndir, sýn og skráseltingar verða inntøkur stovnsins ikki undir 4 milliónir kr.

103143 Løn Starvsfólk:
Við tað at hølisviðurskiftini framvegis eru útlagiring, hevur tað av hesi orsøk ikki verið mett sum skilagott, at sett fleiri starvsfólk. Fyrst nú í heyst verða 2-3 størv sett, peningur er tøkur.
Í skjali 4 »sum hevur samband við byggisakina« er arbeiðsbyrðan lýst og víst á starvsfólkatalið í framtíðini.

123128 Eftirlitbúgving:
Við tað at øll frálæra eftir nýggju lógini verður løgd um, verður neyðugt við lutfallsligum nógvum skeiðvirksemi.

123136 EDV-skeið:
Neyðugt er at starvsfólkið fær høvi til at kunna seg við útviklingin innan EDV.

213806 Leiguútreiðslur:
Við tað at flutt verður í nýggj høli í komandi ári, verður leigan at minka.

233051 Innbúgv:
Í sambond við flyting í nýggju høllini verður brúk fyri meira innbúgvi enn tað, sum vit eiga.

233553 E.D.V.
Bilskráin og sýningin, sum í dag verður avgreidd á »online« skipanini hjá Gjaldstovuni, verður at umskipast og fáast til at koyra betur.

233703 E.D.V. tól (leiga):
M.a. verður brúk fyri fleiri terminalum og printarum.

253306 Amboð:
Til høllina í Havn verður neyðugt við nýggjum amboðum. Líkaleiðis er brúk fyri amboðum í Suðuroy og Eysturoy.

253881 Hálkubreyt:
Grundøkið til breytina er nú so gott sum í lagi, skitsuprojekt er gjørt og sent til góðkenningar, so nú tykist gongd av verða komin á.

253928 Tænastuakfør, rakstur v.m.
Luttøka okkara í § 13 kanningum, (sum lógin áleggur okkum) verður at økjast í komandi ári. Sýningarstøð hava vit á 6 støðum í landinum, so nógv er at koyra til.

353075 Bileftirlitið í grunn:
Nógv hevur verið tosað um grunnin og byggingina her í Havn. Visast skal til, at í Eysturoy og í Suðuroy eru hølisviðurskiftini ikki góð. Lastbilar kunnu ikki bremsukannast á nevndu støðum vegna høli til tólini.

kr.
(1000)

Kontonummar og navn	Roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	uppskot landsst. 1987
83904 Ymiskar inntøkur	1.818.842,00	3.000.0	4.000.0	4.000.0
103143 Løn - starvsfólk	679.891.25	1.372.0	1.580.0	1.580.0
103222 Løn - reingerð	87.574.63	130.0	130.0	130.0
103288 Løn - onnur	334.089.08	650.0	650.0	650.0
103405 Løn - úrtíð	24.941.56	30.0	40.0	40.0
113202 Ferða- og dagp. innl.	94.998.10	115.0	115.0	115.0
123128 Eftirútbúgving	257,07	25.0	40.0	40.0
123136 EDV - skeið	0	0	10.0	10.0
203308 Lýsingar	0	1.0	5.0	5.0
203403 Dagblød, tíðarrit v.m.	1.011.25	4.0	4.0	4.0
213105 El, hiti og vask	49.178.04	80.0	100.0	100.0
213806 Leiguútreiðslur	381.996.97	430.0	260.0	260.0
233051 Innbúgv	3.284.0	12.0	100.0	100.0
233155 Prentlutir	5.000.0	130.0	130.0	130.0
233259 Postgjald	10.823.0	30.0	30.0	30.0
233354 Telefon og telex	41.063.0	80.0	80.0	80.0
233553 EDV - tól keyp meira enn 500 kr.	73.400.0	120.0	200.0	200.0
233561 Aðrar skrivstovuútr.	20.679.13	30.0	50.0	50.0
233703 EDV - tól leiga og umvæling	0	0	30.0	30.0
233711 EDV - forrit keyp og leiga	0	0	50.0	50.0
233728 EDV - serkøn hjálp	0	0	30.0	30.0
233744 EDV - aðrar útr.	0	0	10.0	10.0
253306 Amboð	143.655.54	200.0	400.0	400.0
253881 Hálkubreyt	562.500.0	1.000.0	1.000.0	1.000.0
253903 Aðrar útreiðslur	41.061.13	60.0	60.0	60.0
253928 Tænastuakf., raks. t.v.m.	56.273.94	100.0	150.0	150.0
253075 Bileftirlitið í grunn	1.125.000.00	500.0	2.000.0	1.600.0
			3.254.0	2.754.0

Evni: Viðmerkingar til figgjarlógaruppskot, sum sent er landsstýrinum 20.6.85.
Skjøl: 1) Uppskotið og fylgiskriv
2) Skriv sent figgjarnevndini 25.4.85 viðvíkjandi figgjarstøðu stovnsins.

Sum viðmerking til skriv landsstýrisins J.nr. 400-39 dagfest 8. mai 85 skal sigast, at samsvar altíð hevur verið millum játtan og nýtslu hjá stovni okkara.

Í hesum skrivi er í samband við byggjan av sýnshøll í Havn m.a. greitt frá biltalsvøkstrinum, lógskyldugum sýnum og koyriroyndum. Líkaleiðis er víst á inntøkur stovnsins og møguligan inntøkuvøkstur, soleiðis at møgulelki vildi verið fyri, at stovnurin kundi hvílt í sær sjálvum.

83904 Ymiskar inntøkur:
Víst verður til skjal 2 blað 5.

103143 Løn og starvsfólk:
At tørvur er á fleiri starvsfólkum, skilst m.a. av at bilatalið er so nógv vaksið (sjá í skjal 2 síðu 2) fyri at greiða bert tey lógarfestu árligu sýnini sum eru ca. 20.000 í talið (umsýn + hýruvognar 2 ferðir) so krevjast 6-7 maus til hetta arbeiði, harnæst er, so koyriroyndir, ferðsluóhapp og umsiting.
Tá vit eru so fáir, er tað tí, at arbeiðsumstøðurnar hava verið sera ringar hølum viðvíkjandi, harnæst hevur EDV skipanin darvað okkum í fleiri ár, soleiðis at møguleiki hevur ikki verið fyri at framt sýnsarbeiði til fulnar.
Tað eru fleiri ár síðan, at Suni Rásmussen og Brynjálvur Jensen eru farnir í annað starv, uttan at nakar er komin í teirra stað. Talan hevur tí verið um minking av manntalinum. Sum tað skilst á skjal 2 síðu 2, so hevur Eysturoyggin nærum 4000 bilar og er sostatt tørvur á fullum starvi í økinum. Ein maður er fastbúgvandi í Klaksvík og ein í Suðuroy.

103404 Útríðarløn:
Hóast arbeiði okkara er skipað til at verða í vanligari tíð, er kortini neyðugt við nakað av yvirtíðararbeiði, grundað m.a. á at nógvar innkoyringar og ajourføringar á EDV skipanina verða at gerast aftaná kl. 18.00.

233155 Prentlutir:
E.D.V. skipanin er kostnaðarmikil viðvíkjandi skjølum og tílíkum.

213806 Leiguútreiðslur:
Landsstýrið er vitandi um 100 % leiguvøksturin, sum vit hava verið fyri í Havn.

253881 Hálkubreyt:
Frá Havnar kommunu tykist nú at verða greitt, at vit fáa økið úti í Havnardali. Vísast skal til nýggja ferðslulógaruppskotið, sum kemur til viðgerðar á tingi í heyst, har verður m.a. krav, at koyriroyndir verða í tveimum pørtum, og í so fari er neyðugt við hálkubreyt.

353075 Bileftirlitið í Grunn:
Nú er arbeiðið uppá høllina farin í gongd, og er lunjáttan løgd undir loft. Neyðugt er við øktum inntøkum og harvið størri játtan. Víst verður aftur til skjal 2 síðu 3 og 4.

Ad § 18 - 18216/353208 Radioeftirlitið
Sbrt. skriv dagf. 28. mai 1986.

Uppskot til fíggjarætlan fyri Radioeftirlitið.

Vísandi til bræv Landsstýrisins F. L. j.nr. 400-40, dagsett 23. apríl 1986 skulu vit mæla til, at settar verða kr. 390.000,00 á fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1987 viðvíkjandi rakstrarstað 18216/353209: *Radioeftirlitið.*

Í nevndu upphædd er avsett 50.000,00 kr. til serkøna hjálp og skeiðvirksemi innan doyvan av radioóljóði. Hetta verður mett neyðugt, um óljóðtænastan skal virka til fulnar vegna tað, at í dag verað innflutt nógv nýggj elektrisk og elektrónisk tól, sum eru bygd upp eftir nýggjari teknologi, so sum teldur og útgerð í samband við hesar, stýrdir umformarir, v.m. fyri at taka nøkur dømi. Alt ov nógv av hesari nýmótans útgerð hevur tó tann vansa, at tey eisini órógva á teimum bylgjulongdum, sum vanliga verða brúkt til radio og sjónvarps útsendingar.

Nevnda upphædd verður mett at nøkta raksturin av stovninum í fíggjarárinum 1987 um eitki óvanligt verður áfatt.

*) Hjálagt er ársfrágreiðing fyri 1985 x)
Til skjals á Landsskrivstovuni.

Viðmerkingar landsstýrisins.
Uppskot landsstýrisins er at játta kr. 390.000,-.

Að § 18 - 18235 Ráðið fyri Ferðslutrygd
Sbrt. skriv dagf. 29. mai 1986.

Ráðið fyri Ferðslutrygd loyvir sær hervið at heita á Føroya Landsstýri, um at tað í fíggjarárinum 1987 verða játtaðar ráðnum *kr. 874.500,-* til arbeiði tess og rakstur av skrivstovuni.
Ráðið hevur eisini sent Tryggingarsambandi Føroya umsókn um somu upphædd.
Samlaðu útreiðslurnar eru metlar til kr. 1.779.000,-.
Tær seinastu kr. 30.000,- metir ráðið at kunna fáa inn við limagjaldi frá kommunum og øðrum.
Víst verður annars til viðløgd skjøl.

— — — — — —

Viðmerkingar landsstýrisins.
Landsstýrið hevur samtykt at veita kr. 875.000,-.

Fíggjaretlan fyri 1987

Inntøkur:

Tilskot frá landinum	kr.	874.500
Tilskot frá Tryggingarsambandinum	kr.	874.500
Tilskot frá kommununum	kr.	30.000
a. Lønir	kr.	385.000
b. Bókføring og grannskoðan	kr.	10.000
c. Lýsingar, porto og telefon	kr.	52.000
d. Leiga, hití, ljós og reingerð	kr.	125.000
e. Aðrar útreiðslur	kr.	195.000
f. Tiltøk í komandi ári	kr.	580.000
g. Samsýning til limir í undirnevndum	kr.	60.000
h. Ferðaútreiðslur og fundir	kr.	85.000
i. Keyp av tilfari	kr.	75.000
j. Skeiðvirksemi hjá RFF	kr.	125.000
k. Limagjald til PRI	kr.	12.000
l. Skrivstovuútgerð og búnyttur til frálærurúm	kr.	75.000
	kr.	1.779.000

Viðmerkingar til útreiðslusíðuna:

ad. a. Lønir til leiðara og starvsfólk

ad. b. Útreiðslur til grannskoðan samb. roknskap.

ad. c. Útreiðslur til lýsingar, porto og telefon samb. roknskap. Ráðið metir tað hava týdning við upplýsandi og agiterandi lýsingum í bløðunum.

ad. d. Útreiðslur til leiga, ljós, hita og reingerð samb. roknskap.

ad. e. Ætlaðar aðrar útreiðslur at taka til, t.d. tá aktuel ferðsluviður skifti krevja eyka virksemi. Sum t.d. nú nýggja lógin er samtykt og heitt er á RFF um at lýsa tær størru broytingarnar á ein lættfatiligan hátt.

ad. f. Tiltøk í komandi fíggjarári samb. hjálagda yvirlit.

ad. g. Samsýning til limir í teimum serstøku undirnevndum, sum settar eru av starvsnevndini.

ad. h. Ætlaðar ferðaútreiðslur og útreiðslur í samband við almennar fundir og framsýningar um ferðslutrygd.

ad. i. Ætlaðar útreiðslur til keyp av frálærutilfari, id ókeypis verður latið skúlum og barnagørðum.

ad. j. Útreiðslur í samband við ferðslutrygdarskeið, id RFF skipar fyri annað hvørt ár (1979-81-83-85-87) fyri lærum í fólkaskúlum, læraraskúlanæmingum, koyrilærarum, bileftirlitsfólki og politiskum.

ad. k. Útreiðslur í samband við at RFF er limur í »La Prevention Routiere Internationale«. - PRI.

ad. l. Hetta kemst av: Vit eru flutt í størri høli og hurav økist virksemið t.d. Frálærurúm ætlað til barnagarðsbørn, skúlanæmingum, koyriskúlanæmingum o.o.

Yvirlit yvir tiltøk í fíggjarárinum 1987

1. Tey eldru í ferðsluni	kr. 20.000
2. »Koyr hart tað er so smart«	kr.110.000
3. Ferðsla og alkohol	kr. 75.000
4. Filmir og nyndir	kr.125.000
5. Ferðsluringur Barnanna	kr.150.000
6. Tilfar til barnagarðar	kr. 20.000
7. Tilfar til skúlar	kr. 50.000
8. Lyktakanning	kr. 20.000
9. Árliga frágreiðingin frá RFF	kr. 10.000
	kr.580.000

Viðmerkingar til omanfyri standandi:

ad. 1. Nýggj kampanja RFF fer undir.
ad. 2. Kampanja um hovliga ferð og ferðamark ætlað bilførarum í øllum miðlum.
ad. 3. Kampanja, sum heldur fram í 1987
ad. 4. Filmir og myndir at nýta í samband við fundarvirksemi okkara og at sýna í SVF.
ad. 5. Virksemi hjá ferðsluringinum økist, og eru limir um alt landið.
ad. 6. Samprenting við Trygg Trafikk í Noregi av tilfari til barnagarðar.
ad. 7. Samprenting við Trygg Trafikk í Noregi av tilfari til skúlar
ad. 8. Lyktakanning eins og undanfarin ár.
ad. 9. Árliga frágreiðingin hjá RFF um ferðslustøðuna í Føroyum.
. x) Roknskapur til skjal á landsskrivstovuni.

---

§ 18 - 18268 - Filmseftirlitið
Sbrt. skriv dagfest 3. juni 1986:

Kontonummar og navn	Roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot Landsst. 1987
1. 103143 Løn/starvsfólk	58.832	80.000	76.000	76.000
2. 103288 Løn/onnur	9.000	12.000	12.000	12.000
3. 103509 Samsýningar	162.525	200.000	230.000	230.00 0
4. 113202 Ferða/dagp. (i)	0	25.000	15.000	15.000
5. 113243 Ferða/dagp. (u)	0	6.000	5.000	5.000
6. 213901 Ymiskar hús. útr.	0	1.000	1.000	1.000
7. 233051 Innbúgv	9.648	10.000	5.000	5.000
8. 233155 Prentlutir	6.242	3.000	3.000	3.000
9. 233259 Postgjald	1.438	4.000	4.000	4.000
10. 233354 Telefon/telex	2.004	7.000	7.000	7.000
11. 233561 Aðrar skrivs. útr.	4.439	10.000	7.000	7.000
Tils.	254.129	358.000	365.000	365.000

Viðmerkingar til tey uppskotnu talini:

1. 103143 løn/starvsfólk:
Tað, at filmseftirlitið í sini tíð metti, at tað í longdini bert fór at verða neyðugt við hálvdagssettum skrivstovufólki, sum so heldur mátti arbeiða nakað eyka tað fyrstu truplu tíðina, hevur tíbetur víst seg at verið púra beint, eftirsum filmseftirlitið seinasta hálva árið hevur klárað seg uttan at brúkt yvirtíð.

Sostatt er upphæddin fyri 1986 reiðiliga einføld 12 mánaðarlønir á 5.821 kr. + løn til fritíðaravloysara í eitt mánað, ialt mett til kr. 76.000 fyri árið 1987.

P.S. Viðmerkjast skal at rætta upphæddina á rokniskapinum fyri 1985 er sum uppgivið av filmseftirlitinum og ikki á konto-avriti gjaldstovunar, eftirsum tað vísir seg at Gjaldstovan hevur feil bókað eina mánaðarløn hjá skrivstovuskvinnuni á konto 103288 løn/onnur. Vit hava gjørt Gjaldstovuni varða við feilin.

2. 103288 løn/onnur
Hettar er formanslønin, sum leingi hevur verið og støðugt er 1.000 kr. um mánaðin, hóast munandi økta arbeiðsbyrðu, men eftirsum vit ikki halda tað verða ómakin vert at fara í gongd við at fáa hetta broytt, skjýtur Filmseftirlitið sonn upphædd uppaftur, altso 12.000 kr. fyri 1987.

Viðmerkjast skal aftur her, at upphæddin fyri roknskapin 1985 skal verða 9.000 kr. og ikki 14.452,50 kr., við tað at Gjaldstovan sum omanfyri nevnt hevur feilbókað eina mánaðarløn á 5.452,50 kr. hjá skrivstovukvinnuni her.

3. 103509 Samsýningar:
Hettar eru fundarpeningur fyri nevndararbeiði, fundir, sensursýningar og tílíkt til nevndarlimirnar. Hetta er tað talið, sum er torførast at meta um hesa fyrstu tíðina, stovnurin er farin at virka við sínum økta virkseminum, eins og hetta arbeiðið er lógarbundið og skal fremjast eftir umbøn frá viðskiftafólkinum. Eftirsum upphæddin fyri 1986 vísir seg so dánt at halda fyrsta hálva árið, verður upphæddin kr. 230.000 mett at verða á góðari leið fyri 1987.

4. 113202 Ferða/dagp. innanlands:
Filmseftirlitið hevur ynskt hesa konto fyri at kunna avgreiða neyðug eftirlit á bygd eins og fíggja ørindakoyring, men hava vegna annað meira átrokandi arbeiði enn ikki havt stundir at brúkt av hesi konto, men skuldi tað eftirhondini fari at verið møguleiki fyri at gjørt eisini hetta neyðuga eftirlit.

5. 113243 Ferða/dagp. útlanlands:
Samskifti við útlendsk viðskiftafólk (filmssensurar, videogramselskap og tílíkt) hava vit vegna aðrar arbeiðsuppgávur higartil roynt at avgreitt gjøgnum telefon og brævaskifti, men verður tað í framtíðini mett at verða neyðugt at kunna fara á beinleiðis fund við hesi viðskiftafólk.

6. 213901 Ymiskar húsaútreiðslur:
Ikki er neyðugt við stórari upphædd her, eftirsum hølini eru í hampiligum standi og fyribils bert krevja smávegis viðlíkahald.

7. 233051 Innbúgv:
Eftirsum avgreiðsluhølið nú so nøkurlunda er gjørt innanfyri kartnin av undanfarnu, kann játtanin her nú minkast niður í helvt. Vit ætla okkum at keypa ein stól afturat (hava tveir) og so ein hart tiltrongdan el-ovn, eftirsum sentralhitin stundum als ikki virkar.

8. 233155 Prentlutir:
Meta okkum at klára okkum við kr. 3.000 í 1987 til arkivkort og tílíkt.

9. 233259 Postgjald:
Ilt er at meta um, men meta vit upphæddina 4.000 kr. fyri 1987 á einari leið.

10. 233354 Telefon og telex:
Hóast d rking metir filmseftirlitið seg at klára seg við somu upphædd sum seinasta ár kr. 7.000.

11. 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur:
Eftirsum avgreiðslan nú er hampuliga væl fullfiggjað, skuldi tað í 1987 bert verið neyðugt at keypt eina sektión afturat til arkivið umfram at goldið fyri viðlíkahald av skrivstovutólum og avspælararum.

Samanumtikið verður sostatt talan um niðurskurðir á stórt sæð øllum kontoonum hjá filmseftirlitinum undantikið kotno 103509 samsýningar og verður mett, at tann samlaða upphæddin fer at vera reiðiliga stabil komandi árini — og møguliga minka eitt sindur — verður lógin og hervið tað lógarbundna arbeiðsoki ikki brotin.

§ 18 18304 - Skipaskrá - og uppmáting
Sbrt. skriv dagfest 3. juni 1986:

Under henvisning til landsstyrets skrivelse af 23. april 1986 (j.nr. 400-40) fremsendes vedlagt forslag til finanslov for finansåret 1987 konto nr. 18304.

Kontonummar og navn § 18304 Skipaskrá og - uppmáting	**Roknskapur 1/4-31/12-85**	**Játtan 1986**	**Uppskot 1987**	**Uppskot landsst. 1987**
Lønir samb, skjal 11	392.000	534.000	588.000	588.00
Leiga av kopimask. kr. 2.500.00 pr. mðr.	22.500	30.000	30.000	30.000
Kopimaskina viðlikahald og pappír	4.500	7.000	7.000	7.000
Pappír og prentan	3.750	10.000	15.000	15.000
Skrivstovuhald	2.250	10.000	15.000	15.000
Trygging	4.500	6.000	6.000	6.000
Samsýning - registrator	45.000	60.000	60.000	60.000
Uppmáting av bátum	4.500	6.000	6.000	6.000
Samlað	479.000	663.000	727.000	727.000

Ad § 18 - 18318 Seningsmannaskipanin

kr. (1000)

Kontunummar og navn	**Roknskapur 1/4-31/12-85**	**Játtan 1986**	**Uppskot 1987**	**Uppskot landsst. 1987**
103509 Samsýningar	43.4	33.0	45.0	45.0
253902 Aðrar útreiðslur	66.1	20.0	70.0	70.0
			115.0	115.0

Ad 18 - 18337 Føroya Lærurád
Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1986.

Vísandi til skriv landsstýrisins J. nr. 400-40, dagfest 23. apríl 1986, verður hjálagt sent uppskot til fíggjarløgtingslóg 1987 viðvíkjandi rakstrarstað 18337: *Føroya Lærurád.*

Sum sagt í fylgiskrivinum til fíggjarætlan læruráðsins fyri 1986, dagfest 1. juli 1985, verða í ár gjørdar tær fráboðaðu broytingarnar, ið skulu til fyri at vísa sonnu myndina av, hvat stovnurin kostar at reka. Hesar broytingar eru gjørdar í samráð við landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum (lærlingamálum) og Landsskúlafyrisitingina.

Fyri fyrstu ferð eru lønarútreiðslur til umsitingina av læruráðnum tiknar við í fíggjarætlanini, men enn eru tó eingi størv normerað undir læruráðnum. Sum sæst í viðmerkingunum til tær ymisku konti, so eru lønarútreiðslurnar endigjald til Landsskúlafyrisitingina fyri 1/2 námsfulltrúa og 2 skrivstovufólk í 9. lønarflokki.

Somuleiðis eru útreiðslur til húsaleigu, telefon, postgjald, EDV o.a., ið áður hava verið goldnar av Landsskúlafyrisitingini, nú tiknar við, og er hetta grundin til ta munandi øking av útreiðslusíðuni í mun til undanfarin ár.

Sum gongdin hevur verið hesi seinaru 6 árini, hevur arbeiðið hjá læruráðnum verið støðugt vaksandi ár undan ári, og koma nýggjar uppgávur undan kavi skjótari enn, ella so hvørt sum onnur mál verða loyst. Av fyrisitingarligum uppgávum, ið lagdar eru til læruráðið seinaru tíðina kunnu nevnast: 1) góðkenning og avgreiðsla av lærusáttmálum undir FIIS skipanini, og 2) umsiting av endurgjaldsskipanini til lærupláss fyri løn, meðan lærlingar ganga í skúla.

Spurningurin um normering av størvum til læruráðið beinleiðis, hevur verið viðgjørdur millum landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum og læruráðsformannin, men er uppskot hesum viðvikjandi ikki liðugt enn.

Vísandi til omanfyri standandi verður mælt Føroya Landsstýri og fíggjarnevndini at ganga uppskotinum á møti.

kr.
(1000)

Kontonummar og navn	Roknskapur 1/4-31/12 1985	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landsst. 1987
83904 Ymiskar inntøkur	- 13,8	- 38,0	- 20,0	- 20,0
103048 Løn/tænastumenn			120,0	120,0
103119 Samsý., læruráð.	24,2	60,0	70,0	70,0
103135 Samsý., skoð. o.o.	38,2	180,0	185,0	185,0
103143 Løn/starvsfólk	0,0	0,0	300,0	300,0
103391 Fundarútreiðslur	0,0	6,0	6,0	6,0
113189 Ferða- og dagpen. innanl. - læruráð.	8,7	10,0	12,0	12,0
113197 Ferða- og dagpen. innanl. skoðm. o.o.	4,8	25,0	25,0	25,0
113682 Uttanlandsfundir-læruráðið	11,1	0,0	15,0	15,0
203308 Lýsingar	5,5	15,0	15,0	15,0
213806 Leiguútreiðslur	0,0	0,0	24,0	24,0
233155 Prentlutir	10,2	15,0	15,0	15,0
233259 Postgjald	0,0	0,0	5,0	5,0
233354 Telefon	0,0	0,0	20,0	20,0
233553 EDV-útreiðslur	0,0	0,0	30,0	30,0
233561 Aðrar skrivsl.útr.	3,0	10,0	10,0	10,0
Tilsamans		283,0	832,0	832,0

Viðmerkingar til tær ymsu konti:

ad 83904 Ymiskar inntøkur.
Inntøkurnar stava frá gjaldi, ið lærumeistari skal gjalda í sambandi við, at lærlingur verður innskrivaður til sveinaroynd. Gjaldið er kr. 200,00 fyri hvønn lærling. Roknað verður við, at umleið 100 lærlingar fara til sveinaroynd í Føroyum í 1987.

ad 103048 Løn/tænastumenn.
Lønarendurgjald til Landsskúlafyrisitingina fyri námsfulltrúa, ið arbeiðir uml. 1/2 tíð við læruráðsmálum.

ad 103119 Samsýningar/læruráðið.
Av hesi konto verður veitt samsýning til hinir læruráðsins, og til serkøna hjálp.

Roknað verður við umleið 20 fundir verða hildnir í vanligu læruráðunum og 4 fundir í viðkoma læruráðnum. Í teimum yrkisgreinum, har læruráðslimirnir ikki sjálvir hava neyðugan yrkiskunnleika verður serkøn hjálp nýtt, eitt nú til kannan av verkstøðum.

ad 103135 Samsýning/skoðanarmeistarar o.o.
Av hesi konto verða veittar samsýningar sum hava beinleiðis við sveinaroyndir at gera, eitt nú samsýningar til skoðanarmeistarar, eftirlitsfólk, uppgávunevndir, danskar sveinaroyndarnevndir o.o.

ad 103143 Løn/starvsfólk.
Lønarendurgjald til Landsskúlafyrisitingina fyri 2 skrivstovufólk í 9. lønarflokki, ið arbeiða við læruráðsmálum.

ad 103391 Fundarútreiðslur.
Útreiðslur av fundum, ið hava samband við planlegging av nýggjum útbúgvingum og broytingum í verandi útbúgvingum.

ad 113189 Ferða- og dagpeningur (innanlands) - læruráðið.
Av hesi konto verður goldin ferða- og dagpeningur innanlands fyri læruráðið og serkøn hjálparfólk.

ad 113197 Ferða- og dagpeningur (innanlands) - skoðanarmeistarar o.a.
Av hesi konto verður goldin ferða- og dagpeningur, ið hevur við sveinaroyndir og ársroyndir at gera.

ad 113682 Uttanlandsferðir - læruráðið.
Til tíðir hava læruráðsumboð fyri neyðini at hava fund við m.a. Metalindustriens Lærlingeudvalg og aðrar stovnar í Danmark við sonn uppgávum sum læruráðið, serliga tá tað snýr seg um føroyskar lærlingar í læru og í skúlum í Danmark.

Somuleiðis er neyðugt at lata skrivara læruráðsins taka lut í skeiði í Danmark t.d. viðvíkjandi lærlinga- og læruplássskráseting. Skeið av hesum slagi verða fyriskipað av Erhvervsskolens Personalforening.

ad 203308 Lýsingar:
Lýsingar í útvarpi og dagblaðum viðvíkjandi sveinaroyndum, kunngerðum o.ø.

ad 213806 Leigumtreiðstur.
Landsskúlafyrisitingin hevur hesi seinastu árini goldið húsleigu fyri lærurádið og er ætlanin nú at endurrinda Landsskúlafyrisitinini eina leiguupphædd uppá 2.000 kr. um mánaðin.

ad 233155 Prentlutir:
Brævpappír, konvuluttar, sveinabrøv, lærubrøv o.a.

ad 233259 Postgjald.
Postgjald er higartil goldið av Landsskúlafyrisitingini. Upphæddin er leysliga mett til 5.000 kr.

ad 233354 Telefon.
Telefonútreiðslur eru higartil goldnar av Landsskúlafyrisitingini. Av tí at lærurádið í størri og størri mun ovbyrðar telefonavgreiðslunna hjá Landsskúlafyrisitingini verður neyðugt at lærurádið hevur sítt egna telefonskiftisborð, ið verður mannað av teimum fólkum, sum umsita lærurádsmál.

Útreiðslurnar eru í fyrsta umfari leysliga mettar til 20.000 kr.

ad 233553 EDV-útreiðslur.
Fyri betur at kunna røkja tær uppgávur, ið álagdar eru lærurádnum, eitt nú at hava eftirlit við læruplássum, at fylgja við í gongdini viðvíkjandi lærlingatilgongd og fráfulli í teimum ymisku yrkisgreinunum, og til hagtalsviðgerð av øllum lærlingaviðurskiftum, verður søkt um 30.000 kr. í fyrstu atløgu, ið nýtast skulu til gerð av EDV-skrá og til leigu av EDV-tólum hjá Landsskúlafyrisitingini.

ad 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur.
Nú roynt verður at fáa eina so sanna mynd av veruligu útreiðslum lærurádsins, verða væntandi eisini »aðrar skrivstovuútreiðslur«, ið áður hava verið goldnar av Landsskúlafyrisitingini, øktar.

Að § 18 - 18356 Ferðamannamiðstøð Føroya
Sbrt. skriv dagfest 6. juni 1986:
Uppskot til fíggjarlagtingslóg 1987.

Stýrið fyri Ferðamannamiðstøð Føroya hevur á fundum viðgjørt uppskot til fíggjarlóg fyri stovnin.

Í uppskotinum verður m.a. roknað við, at studningsveitanir til partar av føroyska ferðamannavirksemnum, sum higartil hava verið veittar frá almennari síðu á ymsan hátt, framyvir verða at veita tun játtanina til Ferðamannamaskeðina.

Talið av ferðafólki til Føroya er alsamt vaksandi og væntast eisini at økjast í 1987, føroyska ferðamannavinnan væntast sostatt at fáa øktan úgóða.

Við hesum í huga verður uppskotið til løgtingsfíggjarlóg 1987 sent Føroya Landsstýri.

Rakstrarstað 18356

Kontonummar og navn	Roknskapur 1/4-31/12-85 kr. 1000,-	Játtan 1986 1,000	Uppskot 1987 Viðm. 1,000	Uppskot landsst. 1987 kr. (1000)
103143 Løn/starvsfólk	200,0	516	516 *)	516
103151 Løn/avloysarar	6,8	40	80 *)	80
103222 Løn/reingerð	8,7	15	30 *)	30
103299 Løn/tímalønt	-	-	520 *)	420
103405 Løn/úrtíðarløn	10,5	20	30	30
103509 Samsýningar	30,8	100	120	100
113202 Ferða- og dugp. innan- og uttanl.	8,8	130	130	200
123128 Eftirútbúgving	2,9	50	60	25
133211 Trygging, innbúgv	1,5	-	5	5
203308 Lýsingar	18,0	30	60	50
203403 Dagbl., bøkur v.m.	2,1	20	30	30
203507 Umboðan	43,2	70	150 *)	75
203875 Sýningar	20,9	460	500 *)	400
203883 Útgávuvirksemi	20,0	520	630 *)	500
203891 Framtaksútr.	-	300	700 *)	500
203913 Upplýsing, annars	825,3	150	150	75
213105 El, hiti og vask	4,5	40	40	40
213806 Leiguútreiðslur	27,0	36	72 *)	72
213901 Ymiskar húsaútr.	10,7	15	15	15
233051 Innbúgv	120,1	50	80 *)	50
233155 Prentlutir	27,8	20	50 *)	50
233259 Porto, farmag. v.m.	19,7	30	80 *)	60
233354 Telf., tlx, tlfx.	25,7	50	60	60
233409 Leiga av maski.	16,6	40	80 *)	50
233504 Sakkøn hjálp	7,5	60	60	60
233561 Aðrar skrivst. útr.	30,0	35	40	35
253903 Aðrar útreiðslur	34,9	100	100	50
Tilsamans	1.521,1	2.887	4.388	3.578

Viðmerkingar til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 1987

103143 Løn - starvsfólk

Stýrið fyri Ferðamannamiðstøðina hevur á fundi 4. juni 1986 samtykt at viðmæla umsókn frá stjóranum, at hann verður settur í 30. lønarflokk. Við hesum verður ikki farið út um játtanina á fíggjarlógini.

103151 Løn - avloysarar

Í upphæddini er íroknað frítíðarløn:
1/1 - 31/3 - 1987 10,25%
1/4 - 31/12 - 1987 11,00%
Orsakað av nógvum uppsøkjandi virksemi eisini í útlondum, er neyðugt við nógvari avloysarahjálp á skrivstovuni.

103222 Løn - reingerð

Í upphæddini er íroknað frítíðarløn. Arbeiðið er umfatandi, og upphæddin má tí hækkast.

103299 Løn - tímaløn

Roknað verður við, at útreiðslan av avgreiðslu av ferðafólki, sum koma til landið, framyvir verður at gjalda yvir konto hjá Ferðamannamiðstøðini. Til slíkt virksemi er neyðugt við hesi arbeiðsmegi:

Leiðari 12 mánaðir	kr. 200.000
Hjálparfólk (hálvdags) 12 mánaðir	kr. 100.000
Leys hjálp, summarmánaðir 20 mánaðirl.	kr. 220.000
	Kr. 520.000

203507 Umboðan

Lógin um ferðamannamiðstøðina ásetir:
§ 2, 3. petti: »at hjálpa og vegleiða ferðafólki, íroknað blaðmonnum, ið koma til landið« Kr. 30.000

§ 2, 4. petti: »veita hjálp til áhugafelagsskapir....«

Meginfelag Teirra Brekaða: Til nýtslu hjá felagnum samb. rokning. (Sama upphædd sum í 1986) Kr. 20.000

Norrønt samstarv: Føroyar eru saman við Íslandi og Grønlandi og í samstarvi við ferðamannamiðsavnaran settur av Vestnorden Projektet, við til at fremja tiltøk ferðamannavinnuni at frama Kr. 30.000

Føroyar koma helst upp í Nordisk Turriståd og Nordisk Ministerråds Turistudvalg.
Væntast kann vitjan av hesum í 1987 Kr. 20.000

Fólk frá útlendskum ferðamannastovum:
Neyðugt er, at tey fólk, sum fáast við at senda fólk til Føroyu, sjálvi hava góðan kunnleika til landið. Tað er tí neyðugt at skipa fyri ferðum til Føroya hjá hesum at kunna seg um landið Kr. 50.000

Kr. 150.000

203875 Sýningar

Ætlanin er, at Føroyar verða umboðaðar á hesum altjóða sýningum og »work shops« í 1987:

International Turismus Børse, Berlin februar/mars	Kr. 60.000
Rejs 87, København, mars	Kr. 50.000
Tur 87, Gøteborg, mars	Kr. 40.000
Skandinavisk Workshop, Paris. mars	Kr. 30.000
Skandinavisk Workshop, London. mars	Kr. 30.000
Skandinavisk Workshop, Reykjavík. sept.	Kr. 40.000
R. D. A., Køln, oktober	Kr. 30.000
World Travel Market, London. nov./dec.	Kr. 60.000

Ferð við framsýningarbussi í einum av Norðanlondum (sama sum í Danmark 1986)
Miðað verður ímóti Svørìki í 1987 Kr. 100.000

Grund-tilfar til sýningar og work shops
Nakað er fingið til vega, meira má til (Hetta tilfar verður brúkt aftur og aftur) Kr. 60.000

Kr. 500.000

203883 Útgávuvirksemi

Uppafturprentingar:

Travel Manual	Kr. 10.000
Travel Guide	Kr. 30.000
Reise Führer	Kr. 30.000
Turist fører	Kr. 40.000
Færøernes Fugle	Kr. 30.000
Faroese Birds	Kr. 30.000
Færøerne, det nye nordatlantiske rejsemål	Kr. 50.000
Umseting og prent av hesum á fronskum »Færøerne« á donskum, onskum, týskum og fronskum. Útreiðslur helvtarbýtt við Danmarks Turistråd	Kr. 80.000
Bóklingur um ferðslu í náttúruni	Kr. 50.000
Bóklingur um Tinganes	Kr. 70.000

Bóklingur um bygd (Saksun)	Kr. 70.000
Fotoarkiv	Kr. 50.000
Plakatir, uppaftirprent av plakatum	Kr. 20.000
	Kr. 630.000

203891 Framtaksútreiðstur

Ferðamannamiðstøðin hevur sambært lóg um virksemið m.a. hesar skyldur:

Veita hjálp til áhugafelagsskapir kring landið, herundir stovnseting av avgreiðslum, har tað tykist neyðugt Kr. 200.000

Leggja til rættis útferðir, vitjanir oa. ítriv fyri ferðafólk Kr. 25.000

Hava neyvt samstarv við jarðaeigarar og friðingarmyndugleikar við tí endamáli, at náttúru- og mentunarvirði ikki verða skemd ella fara fyri skeyti av tí virksemi, ferðamannastreymurin hevur Kr. 25.000

Skráseta og skipa sølur av gistingarplássum og samskipa hetta virksemi við lokalar avgreiðslur og ferðamannastovur Kr. 200.000

Gera vegleiðingar og geva upplýsingur um, hvar og hvussu fólk kunnu ferðast ella støðast Kr. 50.000

Ferðamannamiðstøðin má stuðla tí uppsøkjandi virksemi úti um landið, sum so munagott varð byrjað í Norðoyggjum í 1985 Kr. 200.000

Kr. 700.000

213806 Leiguútreiðslur

Ferðamannamiðstøðin væntast at flyta í onnur høli. Víst verður til brævi til Føroya landsstýri, dagfest 12. mai 1986 um keyp av »Fútastovu«. Afturat leiguútreiðslunum kemur leiga av hølum til Ferðamannaslovuna.

233051 Innbúgv

Samráðingar eru í løtuni við Danmarks Turistráð um føroyska luttøku í eini teldu-skipan »Dandata«. Eftir hesi skipan skal bera til hjá Ferðamannastovum í útlandinum beinleiðis at fáa upplýst um føroysk gistingarviðurskifti, framsýningar, ferðaætlanir, stevnur, o.a. Verður Ferðamannamiðstøðin at luttaka, verður neyðugt við ymsum tólum til hetta endamál.

233155 Prenthutir

Virksemið á Ferðamannamiðstøðini er so stórt, at henda útreiðsla hevur verið stórliga undirmett bæði í 1985 og 1986.

233259 Porto, farmagjald

Viðmerkingarnar til figgjarlógina fyri 1986 vóru gjørdar, áðrenn Ferðamannamiðstøðin fór at virka. Virksemið hevur víst, at nógv verður sent av upplýsandi tilfari út í lond og útreiðslan tí er munandi størri enn ætlað.

233409 Leiga av maskinum

Á Ferðamannamiðstøðini verður heilt nógv gjørt við foto-samtøk. Tá talan er um nógv eintøk av sama slag, er hetta kostnaðarmikil háttur. Umhugsað verður tí at leiga skrivstovu-offsett útgerð.

Að § 19 - 19056 Fólkapensjón v.m.
Sbr. skriv dagfest 6. og 10. juni 1986:

Vísandi til skriv landsstýrisins frá 23.04.86., j.nr. 400-40, senda vit hjálagt skjal 1 við meting okkara um útreiðslur landskassans til almanna-veitingar í figgjarárinum 1987.

Sostatt eru landskassans útreiðslur til almannamál fyri 1987 mettar til kr. 217.515, meðan játtaðar eru kr. 206.260,- fyri 1986 og eftir fyribils roknskapi nýttar kr. 154.664,- í tíðini 1.04.-31.12.85.

Játtanin til Frítíðarheimið í Skrivaragøtu, kr. 894.000,- fyri 1987 er nú eins og áður tald undir útreiðslunum til »Vanliga forsorg«, og er henda konto nú nevnd »onnur hjálp« eftir forsorgarlógini. Kontoin til »Einkjupensjón« er nú býtt sundur í »Einkjupensión« og »Uppískoytisveiting«.

Metingarnar eru gjørdar sambært skrivligu leiðbeiningina, sum vit hava fingið, og skulu vit tó leggja fylgjandi afturat:

Útgjaldingarnar av almanna-veitingum fevna um fólkapensión, avlamispensión, heimahjálp, dagpening og ymisk sløg av hjálp annars.

Tølini av móttakarum vóru pr. 1. januar 1986 hesi:

Fólkapensión 4.720, avlamispensión v.m. 1.243, einkjupensión 59, einkjubarnapening 289, barnaforsorg 80, hjálp eftir forsorgarlógini 295, dagpeningur 321 og heimahjálp 880 (heim).

Roknað er við, at talið á fólka- og avlamispensiónistum økist við umleið 2 % árliga.

Kontonummar og navn	Rokaskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landssk. 1987
19056 Fólkapensjón	71.835	99.299	104.245	104.245
Hækkingar·	-	-	-	-
19106 Avlamispensjón	23.909	33.030	33.010	33.010
19208 Barnastyrkur til st. uppihaldarar	1.304	1.529	1.750	1.750
19301 Einkjupensjón	668	926	845	845
19403 Onnur hjálp eftir forsorgarlógini	13.087	15.860	19.365	19.365
19519 Uppískoytisveit.	716	1.019	830	830
19557 Barnaforsorg	3.840	4.472	6.000	6.000
19507 Heimahjálp	14.005	17.000	19.050	19.050
19659 Dagpeningaskip.	15.121	19.425	19.050	19.050
19664 Bjálving av húsum hjá pensjónistum	2.250	3.000	750	3.000
19752 Brennistudningar hjá pensjónistum	3.636	4.500	4.500	4.500
19802 Samsýning fyri at ansa 363789 eldri og óhjálp. heima	2.609	4.000	5.135	5.135
19904 363611 Ellisheim	1.684	2.200	2.985	2.985
Tilsamans	154.664	206.260	217.515	219.765

Vísandi til skriv landsstýrisins frá 23. apríl 1986, j.nr. 400-40, og skriv Almannastovunnar frá 6. juni 1986 viðvíkjandi meting okkara og útreiðslur landskassans til almanna-veitingar í fíggjarárinum 1987 skulu vit nú vísandi til samrøðu við Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, siga frá, at um so verður, at broyting verður gjørd í lóggávuni viðvíkjandi avlamispensjón (inntøka hjá hjúnafelaga verður ikki framyvir at ávirka útrokningina av avlamispensjónini) og at barnferðarloyvi verður longt til 24 vikur (broyting í lóggávuni um dagpening), tá vil bruttoútreiðslan á hesum nevndu økjum í mun til tey tøl, sum Almannastovan hevur sent landsstýrinum hin 6. juni 1986 økjast við ávikavist 9.350.000 kr. og 2.065.000 kr.

Vit kunnu í hesum sambandi vísa til notatir frá Almannastovuni frá ávikavist 15. februar og frá 28. februar 1985.

Viðmerkjast skal, at útreiðslan til avlamispensjón í mun til nevnda notat er regulerað við 6,33 % og útreiðslan til dagpening er regulerað við 7,22 %.

Lagt verður afturat, at pensjónir verða reguleraðar eftir danska »reguleringsprístallet«, og meðan dagpeningurin verður reguleraður eftir føroyskum prístali og sáttmálavtalum.

Um hesar útreiðslur kunnu vit siga soleiðis:

A) Avlamispensjón

a) Fordeiling sum lóggávan er nú:

bruttoútreiðsla	9.350.000 kr.
ríkiskassin	4.675.000 kr.
Føroya partur	4.685.000 kr.
kommunurnar	780.000 kr.
landskassin	3.895.000 kr.

b) Føroyingar bera alla útreiðsluna, men kommunurnar bera tá 1/6 eftir núgaldandi fordeildingsmodellinum:

bruttoútreiðsla	9.350.000 kr.
kommunurnar	1.560.000 kr.
landskassin	7.790.000 kr.

c) Føroyingar bera alla útreiðsluna og hon verður lutað á landskassan burturav:

bruttoútreiðsla	9.350.000 kr.
ríkiskassin	-- kr.
kommunurnar	-- kr.
landskassin	9.350.000 kr.

B) Dagpeningur

a) Fordeiling, sum lóggávan er nú:

bruttoútreiðslan	2.065.000 kr.
ríkiskassin	825.000 kr.
kommunurnar	-- kr.
landskassiu	1.240.000 kr.

b) Føroyingar bera alla útreiðsluna, men kommunurnar bera tá 1/6 sum eftir núgaldandi fordeildingsmodellinum annars á sosiala økinum:

bruttoútreiðslan	2.065.000 kr.
ríkiskassin	825.000 kr.
kommunurnar	205.000 kr.
landskassin	620.000 kr.

c) Føroyingar bera alla útreiðsluna og hon verður lutað á landskassan burturav:

bruttoútreiðsla	2.065.000 kr.
ríkiskassin	-- kr.
kommunurnar	-- kr.
landskassin	2.065.000 kr.

Til kunningar leggja vit við: ×)

1) Ljósprent av notati okkara frá 15. februar 1985.
2) Ljósprent av notati okkara frá 28. februar 1985.
3) Ljósprent av pensjónssatsyvirliti pr. 1. oktober 1984.
4) Ljósprent av pensjónssatsyvirliti pr. 1. apríl 1986.
5) Ljósprent av yvirliti pr. 1. oktober 1984 yvir arbeiðsmannalønir.
6) Ljósprent av yvirliti pr. 1. mai 1986 yvir arbeiðsmannalønir og
7) Ljósprent av yvirliti yvir føroyska prístalið í tíðini 1. januar 1985 og 1. apríl 1986.

×) til skjals á landsskrivstovuni.

Ad § 19 - 19904/363636 Frálhaldsfelog
Sbrt. skriv frá Blákross:

Vísandi á undirskotið á fíggjarætlan okkara fyri árið 1987 loyvir Felagsnevndin fyri Blákross í Føroyum sær, eins og undanfarnu ár, at søkja um studning til arbeið okkara frá Føroya Landsstýri.

Fíggjarætlan fyri Felagsnevndina hjá Blákross 1987.

Inntøkur:

Gjald frá lokalfeløgunum	Kr. 50.000,00
Kreditforeningen Danmark	Kr. 12.000,00
Gávur	Kr. 5.000,00
Undirskot	Kr. 171.500,00
	Kr. 238.500,00

Útreiðslur:

Lønir	Kr. 100.000,00
Telefon og aðrar lýsingar	Kr. 11.000.00
Postgjald	Kr. 500,00
Ferðaútreiðslur	Kr. 2.500,00
Bøkur	Kr. 3.000,00
Blákross ársmøti í Danmark	Kr. 6.000,00
Summarlega í Danmark	Kr. 6.000,00
Avdráttur og rentur av láni	Kr. 106.000,00
Leiga av húsi	Kr. 500,00
Ymiskt	Kr. 3.000,00
	Kr. 238.500,00

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er at játta kr. 425.000,- kr til frálhaldsfeløgini.

Að § 19 — 19904/363669 Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum (M.B.F.)
Sbrt. skriv dagfest 19. juni 1986:

MBF søkir við hesum at koma á fíggjarlógina 1987 við hesum upphæddum:

MBF	kr.	363.000
Felagið BJØRG (f. rørslubrekað)	kr.	212.500
Deyvafelag Føroya	kr.	241.500
Sinnisbati	kr.	56.000
Sclerosefelgið	kr.	22.600
Javni (evnaveikum at bata)	kr.	95.000
Føroya Blindafelag	kr.	72.600
Diabetesfelag Føroya	kr.	32.000
	kr.	1.095.200

MBF:

Útreiðslur:

Løn 3/4 fólk (15. lønarfl.)			kr. 127.000
Løn 1/2 fólk (12. lønarfl.)			kr. 68.000
Samsýning til starvsnevnd			kr. 30.000
Porto og skrivstovuhald	kr.	21.000	
Lýsingar	kr.	10.500	
Ferðaútreiðslur (herundir skeið og framsýningar)	kr.	47.500	
MBF-tíðindi: Hall	kr.	46.000	
Luttøka á nordl. fundum	kr.	25.000	kr. 150.000
			kr. 375.000

Inntøkur:

Limagjald	kr. 12.000
Íalt:	Kr. 363.000

Viðmerkjast skal, at umframt loyvda markið 5 %, verður søkt um hesar meir- og nýútreiðslur:

1. Skrivarin:

3/4 løn til skrivaran, ið higartil hevur arbeitt hálva tíð.

2. Skrivstovufólk:
Setan av einum skrivstovufólki 1/2 tíð. Grundgevingin er hon, at arbeiðið er vorðið so rúgvismikið, at skal MBF kunna avgreiða tey mál og teir fyrispurningar, ið koma, er neyðugt við størri arbeiðsmegi.

Lagt verður aftrat, at skal MBF virka eftir ætlan, eigur skrivstovan at vera opin allan dagin og ikki sum nú bert hálvan dag.

3. Starvsnevndin:
Fyri árið 1986 søktu vit um 16.000 kr. fyri tímalønt arbeiði. Hesa upphædd hava vit hækkað við 14.000 kr. og verður hon her nevnd: Samsýning til starvsnevnd.

Við tí lítlu arbeiðsmegi skrivstovan hevur, er umráðandi við einari virknari starvsnevnd, og krevja nógv av málunum starvsnevndarviðgerð.

Um ikki skrivarin kann heita á starvsnevndina í ivamálum ber illa til at arbeiða. Ivamálini eru nógv, við tað at feløgini eru nógv og áhugamál teirra so ymisk.

Hetta krevur stóra vitan á nógvum økjum og tí nógvar starvsnevndarfundir.

Vit meta tað tí vera rætt, at starvsnevndin fær samsýning fyri arbeiði sítt.

4. HNR:
HNR stendur fyri Handikapporganisntionernas Nordiska Råd, har MBF er limur. Hetta krevur luttøku við minst 2 fólkum eina ferð um árið.

Viðmerkingar:
Í MBF eru 8 limafeløg. ÍSB (Ítróttarsambandið fyri brekað), er ikki nevnt her. Hetta felag verður fíggjað yvir ÍSF.

Nøkur av hesum feløgum hava gjøgnum tíðina søkt um at koma á fíggjarlóg ina, men hevur tað ikki eydnast.

MBF hevur síðani tað varð stovnað fyri skjótt 5 árum síðani á hvørjum ári søkt um stuðul til limafeløgini, tó uttan at nakað hevur verið játtað.

Tá hugsað verður um tað sjálvboðna arbeiði hesi feløg gera, er tað ikki mera enn rímiligt, at feløgini koma á fíggjarlógina við tí upphædd tey søkja um til rakstur.

Hvørt felag sær hevur brúk fyri einum høli og einum hjálparfólki — í minsta lagi nakrar tímar um vikuna — skal eitt felag virka fyri limir sínar.

Sum støðan er í dag mugu feløgini skipa fyri ymiskum tiltøkum fyri at klára raksturin. Hetta er ikki rætt, tað minkar um orkuna hjá teimum, ið stíla fyri, og ger, at sjálvt felagsarbeiðið gongur striltið.

Skulu feløgini framyvir gera tiltøk fyri at útvega pening og tað er neyðugt um mál skulu røkkast ið krevja fløgur — eigur hesin eingur ikki at fara til raksturin.

MBF - limafelagini:
Hóast tað at feløgini eru limir í MBF er ikki gjørligt at hjálpa teimum í øllum dagliga arbeiði teirra. Um so var skuldi MBF-skrivstovan verið mannað við uppaftur fleiri fólkum.

Fyrimunurin hjá einum felag at vera limur í MBF er, at vit taka upp felagsmál, ið eru av áhuga, skipa fyri skeiðum, limafundum v.m.

Eisini er uppgávan hjá MBF at stuðla feløgunum, tá ið tey ynskja tað, við at taka upp samráðingar við myndugleikar og aðrar stovnar.

Vit vóna góða viðgerð av umsóknini.

Um landsstýrið ynskir tað vilja vit fegin koma á fund og greiða nærri frá.

Kontonummar og navn	Roknskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot landsst. 1987
	sí viðlagda	300.000	1.095.200	700.000
	skjal			

Roknskapir fyri limafeløgini o.a. er til skjals á landsskrivstovuni.

Ad § 19 - - 19904-363715 Føroyahús í Keypmannahavn

Sbrt. skriv dagfest 10. juni 1986:

Viðv. grunninum »Føroyahús í Keypmannahavn«.

Sum kunnugt er framvegis eingin loysn komin á spurninginum um nýggja Føroyahøli her í Keypmannahavn. Nevndin hevur gjørt sítt besta fyri at lýsa eftir og leita upp høli/bygningar til keyps ella leigu, men hevur tað víst seg, at útboðið av egnaðum møguleikum er minni enn nakrantíð áður. Hinvegin er somja um bert at keypa ella leiga høli, ið kunnu nøkta tørvin nógv ár fram.

Hildið verður fram við at lýsa og leita, men hava vit onga trygd fyri at fáa nýggj høli innan fyri næsta árið. Tað er torført við vissu at siga, hvussu stóra upphædd vit hava fyri neyðuni til rakstur av Føroysku Hølunum.

Tessvegna verður søkt um somu upphædd sum játtað er í hesum fíggjarári t.e.

Kr. 600.000

Harav umleið kr. 350.000 eru til dagliga raksturin eksl. húsleigu, hita og ljós.

Vit vóna at umsóknin verður gingin á møti.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Landsstýrið hevur samtykt at játta kr. 600.000,-.

Ad § 19 - 1990/363797 Ráðgeving fyri føroyingar í Danmark.

Sbrt. skriv dagfest 11. juli 1986:

Almannastovan hevur fingið avrit av umsókn dagfest 24. juni 1986 frá Ráðgevingini fyri Føroyingar í Danmark um studul á fíggjarlógini 1987, j.nr. F. L. 400-40.

Almannastovan tekur av fullum huga undir við umsóknini, og kunnu vit vátta, at vit í øktum vavi hava samband við Ráðgevingina, og er hetta til stórt gagn fyri málsviðgerð okkara og sostatt fyri viðskiftafólkið.

Vit taka undir við niðurstøðu nevndarinnar um, at tørvur er á víðkan av manningini, og halda vit, at uppskotið um at broyta hálvtíðarstarvið til fulltíðarstarv er fyri neyðini. Somuleiðis halda vit, at tørvur er á at hava eitt fólk til at taka.

Almannastovan skal tí loyva sær at mæla til, at landsstýrið gongur umsóknini um játtan av 262.000 kr. fyri 1987 á møti.

Viðmerkingar landsstýrisins:

Landsstýrið hevur samtykt at játta kr. 262.000,-.

Ad § 19 - 1990/363802 Andveikraverndin

Sbrt. skriv dagfest 4. juni 1986:

Vísandi til skriv landsstýrisins frá 23. apríl 1986 journal nr. 400-40, senda vit hjálagt skjal 1 við undirskjølum, við meting okkara um útreiðslur landskassans til raksturin av »Bústovninum á Gerðisvegi«, í Saltangará.

Viðmerkjast skal, at stovnurin enn er á einum tilloðingarstøðið, og hava vit ikki í øllum førum kunna hildið okkum til ta í leiðbeiningini petti 5 umrodda 5 % markið.

Andveikraverndin annars:
Sum landsstýrinum kunnugt hava vit ríkisstovnarnir hjá Andveikraverndini merkt sviðan av sparipolitikkinum hjá donsku stjórnini, hetta hevur millum annað borið við sær, at bæði starvsfólkatalið og rakstrarútreiðslurnar eru lækkaðar.

Fyri ikki at viðgerðarstøðið á hesum stovnum skal lækka enn meira, verður tí heitt á landsstýrið um at játta fylgjandi upphæddir á fíggjarlógini fyri 1987:

Til Eirargarð 14-16	Kr. 1.300.000,-
Til Verstaðið »Vón«, Hóvabrekka 1, 3800 Argir	Kr. 73.300,-
Til Pensionatið, á Mýrini 6, 3800 Hoyvík	Kr. 52.400,-
Til Andveikraverndina, Jekaragøta 8	Kr. 85.000,-
Íalt	Kr. 1.515.700,-

Hjáløgd fylgiskriv frá leiðarunum á nevndu stovnum, har greitt verður nærri frá tørvinum.

Eisini er hjálagt skriv, sum Almannastovan hevur sent Socialstýrinum í samband við uppskot okkara til figgjarlóg 1987.

kontonummar og navn	Rokuskapur 1/4-31/12-85	Játtan 1986	Uppskot 1987	Uppskot Landsstý. 1987
19904/363802 Andveikrav.	736.649,39	2.100.000	3.842.800	3.842.800

Figgjarætlan 1987 fyri bústovn í Eystnroynni fyri andveik.

Løn- starvsfólk 01 02 03 04	1.868.600,00 Kr.
Veitingar til búfólk 06	40.300,00 Kr.
Ferða- og dagpeningur 07	8.800,00 Kr.
Skrivstovuhald 10	30.100,00 Kr.
Tænastuveitingar 12	22.000,00 Kr.
Vørukeyp til nýtslu 15	145.000,00 Kr.
Keyp av innbúgvi 20	40.000,00 Kr.
El, hiti 21	43.000,00 Kr.
Viðlíkahald v.m. 22	30.000,00 Kr.
Húsaleiga 25	89.000,00 Kr.
Aðrar útreiðslur 39	10.000,00 Kr.
Í alt rakstrarútreiðslur	2.327.100,00 Kr.

Umsókn um eykajáttan:

Eftir áheitan frá Almannastovuni skal stovnurin koma við eini meting um, hvussu stór upphædd eigur at verða avsett á føroysku figgjarlógini fyri 1987 fyri at mótvirka at viðgerðarstøði stovnsins skal lækka munandi orsakað av, at játtanin frá Socialstýrinum verður skerd soleiðis sum fráboðað.

Lønartørvur stovnsins er sambært útrokningum okkara f. 1987 uppá 940.000 kr. meira enn tær 9.488.300 kr., sum Socialstýrið játtar. Harumframt verður

søkt um eina upphædd uppá 200.000 kr. fyri at kunna veita vissu fyri at búfólk við serligum tørvi kunnu fáa hóskandi viðgerð í Føroyum.

Hendan upphædd er neyðug orsakað av, at møguleikar ikki eru fyri at søkja eykajáttan til slík endamál yvir donsku fíggjarlógina, sum Landsstýrinum kunnugt verður niðurskorin á hvørjum ári við ávisum procenttali.

Í løtuni verður peningur nýttur til eitt tílíkt projekt á Eirargarði 14A, har arbeitt verður miðvíst við at broyta sjálvskaðandi atburðin hjá einum sálarligum sjúkum búfólki. Um tað ikki hevði borið til at framt eina slíka viðgerð á stovninum, hevði viðkomandi búfólk óivað verið sent av landinum til viðgerðar. Ein viðgerð, sum vit væl kunnu geva, um bert vit fáa umstøður til tað.

GRUIFORMES Gruidae	Grus sp. *	**TRANEFUGLE** Egentlige traner alle arter af traner tilhørende slægten Grus
	Anthropoides Virgo	Jomfrutrane
Otididae	Chlamydotis undulata * + 201	Trapper Kravetrappe
CHARADRIIFORMES		**MÅGE-VADE-ALKEFUGLE**
Charadriidae	Charadriidae sp.	Brokfugle alle arter af alle arter af sneppef.
Scolopacidae sp* Recurvirostridae	Scolopacidae sp*	Klyder
	Recurvirostridae sp.	alle arter af Klyder
Phalaropodidae	Phalaropodidae sp.	Svømmesnepper aller arter av svømmesnepper
PASSERIFORMES Muscicapidae	Muscicapidae sp. (s.l).	**SPURVEFUGLE** Drosselfugle aller arter af drosselfugle.

1. Højere systematiske enheder	2. Appendix II (liste II) Migrerende arter, hvorom der skal indgås aftaler	3. Danske navne
REPTILIA		**KRYBDYR**
TESTUDINES		SKILDPADDER
Cheloniidae		Havskildpadder
	Cheloniidae sp. *	alle arter af havskildpadder
Dermochelydidae		Læderskildpadder
	Dermochelydidae sp. *	læderskildpadder
Pelomedusidae		Halsvendere
	Podocnemis expansa *	Arrau-skildpadde
CROCODYLIA		**KROKODILLER**
Crocodylidae		Krokodiller
	Crocodylus porosus	Saltvandskrokodille el. Listekrokodille
PISCES		**FISK**
ACIPENSERIFORMES		STØRER
Acipenseridae		De ægte stører
	Acipenser fulvescens	Søstør
INSECTA		**INSEKTER**
LEPIDOPTERA		SOMMERFUGLE
Danaidae		
	Danaus plexippus	Monarken

Konventionen trådte i medfør af artikel XVIII, stk. 1, i kraft den 1. november 1983.

Danmarks ratifikation skete med forbehold om, at konventionen, indtil andet måtte blive besluttet, ikke skal gælde for Færøerne og Grønland.

Foruden Danmark har følgende lande ratificeret eller tiltrådt konventionen:

Cameroun, Dan centralafrikanske Republik, Chile, Egypten, Elfenbenskysten, Frankrig, Grækenland, Indien, Irland, Israel, Italien, Jamaica, Luxembourg, Madagaskar, Marokko, Nederlandene, Niger, Norge, Paraguay, Philippinerne, Portugal, Somalia, Spanien, Sri Lanka, Storbritannien, Sverige, Tchad, Togo, Forbundsrepublikken Tyskland, Uganda og Ungarn.

De europæiske Fællesskaber har tiltrådt konventionen med beslutning om, at tiltrædelsen ikke omfatter Grønland.

Udenrigsministeriet, den 15. september 1986.

Uffe Ellemann-Jensen.

Skjal til Løgtingsmál 47/1986: Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis)

Álit
um
Fróðskaparsetur Føroya

571

Álit

um

Fróðskaparsetur Føroya

Evnisyvirlit:

SAMANDRÁTTUR ..... bls. 1

INNGANGUR ..... bls. 4
Verandi skipan ..... bls. 5
Tørvurin á hægri útbúgving og gransking ..... bls. 5

UPPSKOT TIL ÚTBÚGVINGARSKIPAN ..... bls. 7
Almenn skipan ..... bls. 7
Hugvísindarligar lærugreinar ..... bls. 8
Samfelagsvísindarligar lærugreinar ..... bls. 10
Náttúruvísindarligar og tøknifrøðiligar lærugreinir ..... bls. 11
Onnur nám ..... bls. 14

LÆRARAR ..... bls. 16
Starvslag ..... bls. 17

GRANSKING ..... bls. 18

STÝRISSKIPAN ..... bls. 19

RITMYNDIR (1 - 5) ..... bls. 21

YVIRLIT YVIR FYLGISKJØL ..... bls. 26

FYLGISKJØL (1 - 10, tils. 76 bls.)

— — — — —

Greitt út hondum hevur nevndin, Føroya landsstýri setti í mars at gera uppskot til at menna Fróðskaparsetrið sum hægri lærustovn.

Tórshavn, mars 1986

Samandráttur

Føroyar eru í dag eyðkendar av ríkum mentanarlívi, góðum lívskorum, stórum búskaparligum virkisfýsni og nógvum íløgum í framleiðslutól. Skal henda framgongd standa við, verður tað neyðugt eisini at gera støði undir komandi menning við **at stimbra hægri útbúgving og gransking.** Henda sannroynd er viðurkend í flestum londum, serstakliga í Europu.

Í Føroyum vóru í 1985 játtaðar um leið 8 miliónir til hægri útbúgving og gransking á Fróðskaparsetri Føroya. Sammett við onnur lond eru hetta smá tøl, tó at vit seta tey í mun til fólkatal ella tjóðarinntøku. Nevndin metir tí, at politisk avgerð eigur at takast um at menna gransking og útbúgving á setrinum í **hugvísindum, samfelagsvísindum, náttúruvísindum og tøkni.**

Tað verður eyðvitað kostnaðarmikið hjá Føroyum at senda tey lesandi av landinum, men nevndin leggur dent á tað virði, gransking og hægri lestur í landinum hevur fyri samfelagið alt. Vit hugsa her um møguleikan at laga innihald í lestrinum eftir samfelgnum og um tey mongu ungu, sum eftir loknan lestur uttanlands ikki koma heim aftur, men eins týðandi og hetta er tað gagn, landið hevur av einum hægri lærustovni og tí umhvørvi og serkunnleika, hann ber við sær. Hvørt ár verða nógvar miliónir nýttar til ráðgeving frá útlendskum stovnum og fyritøkum, og partur av henni gjørdist bæði ódýrari og betur heima. Tað er torført at gera upp í peningi gagnið í einum hægri lærustovni, men royndir uttanlands sýna greitt samband millum menningina í einum landi og tað, sum landið játtar til tílík endamál.

Nevndin heldur, at menningin á hesum øki gerst best á Fróðskaparsetrinum. Tað, sum longu er sett í verk í gransking og útbúgving á setrinum, kann nýtast sum støði undir einum lærustovni á universitetsstigi.

Fyri lítla tjóð er tað sera umráðandi við einum vísindaliga rúmum stovni, har sum útbúgvingar til ymisk endamál kunnu samskipast sum mest. Verkfrøðingar eiga sum dømi at kunna lesa stóran part av tíðini saman við øðrum næminum.

Við hesum fortreytum skjýtur nevndin upp nýggja skipan fyri Fróðskaparsetur Føroya við hesum aðaltáttum.

Líkindi verða gjørd fyri gransking í **hugvísindum, samfelagsvísindum og náttúruvísindum/tøkni,** har sum serligur dentur verður lagdur á serføroysk evni og á evni, sum hava serligan týdning fyri Føroyar.

Skipaðar verða útbúgvingar í somu evnum. Støðið undir teimum verða tær útbúgvingar, tvey ár til longdar, sum longu eru á Føroyamálsdeildini og Støðisútbúgvingini, og skipað verður eisini tvey ára grundútbúgving í samfelagsvísindum. Hetta støði verður víðkað við lestri, ið tekur eitt til hálvt annað ár. Hesar útbúgvingar, sum tilsamans taka trý til hálvt fjórða ár, kunnu sammetast við **B.A. — ella B.S.** — námini, sum eru víða hvar í heiminum, og í tøkni kunnu tær eisini metast við lestur til akademiverkfrøðing.

Tær samstarvsavtalur, setrið hevur við lærustovnar í útlondum, eiga tó at verða víðkaðar, so at næmingarnir hava høvi til at fáa sum mest av lestri sínum á setrinum góðkendan, um teir fara uttanlands at lesa aftan á at hava lokið alla útbúgving sína ella partar av henni á setrinum.

Eisini eigur setrið í samstarv við lærarar uttanseturs at kunna bjóða eitt serbúgvingarár oman á loknan lestur, bæði sínum segnu næmingum og næmingum, sum lisið hava uttanlands.

Í fyrstu atløgu verður neyðugt at nýta nógvar **lærarar, sum ikki hava fast starv á setrinum,** við tað at nóg mikið av fólki við neyðurviligum serkunnleika annars ikki fæst. Hetta krevur tó, at uttanseturs lærarar verða knýttir formliga at setrinum sum uttanseturs lektarar og professarar.

Ætlaða menningin, sum verður á setrinum, **krevur at broyta stýrisskipanina,** og nevndin tykir, at nýggja skipanin eigur í høvuðsheitum at líkjast teirri skipan, lærdir háskúlar í grannalondum okkara hava.

Við teirri ætlan, sum her er løgd fram, hevur nevndin skotið **upp ein karm,** sum loyvir vøkstri í granskin og hægri lestri í Føroyum í komandi árum. Samstundis meta vit tað tó verða neyðugt, at ávísar útbúgvingar verða settar á stovn beinanvegin, útbúgvingar sum týða so nógv fyri Føroyar, og ikki eigur at vera bíðað við teimum.

Her hugsa vit um eina útbúgving í *føroyskum máli og bókmentum,* eina útbúgving, sum leggur serligan dent á *føroyska søgu og siðsøgu,* eina *samfelagsvísindaliga støðisútbúgving* við framhaldi, lestur í *matvøruverkfrøði við serkunnleika í fiskaúrdrátti* og saman við honum *B.S.-nám í lívfrøði, eina* útbúgving í *ravmagnsverkfrøði* og knýtta at henni *B.S.-nám í alis- og jarðalisfrøði og B.S.-nám í teldufrøði og hagfrøði.*

Hetta yvirlit kann tykjast heldur rúgvumikið og dýrt, men allar hesar útbúgvingar, uttan tær samfelagsfrøðiligu, eru grundaðar á tær útbúgvingar, sum longu eru á setrinum. Eisini er nógv frálæra felags fyri ymiskar útbúgvingar, og kostar tað upp á seg lítið at stovnseta tær.

Vit hava lagt høvuðsdent á at skjóta upp útbúgvingar, sum fáa alstjóan **týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum,** og sum í sama viðfangi geva okkum meira fyri tær íløgur, ið sum er verða lagdar í setrið.

Hóast útreiðslurnar upp á seg so statt eru smáar, metir nevndin tó, at útbúgvingar, sum skotnar eru upp, eru á somu hædd sum líkar útbúgvingar í grannalondum okkara.

Neyvari útgreiningar av teimum ymsu lestrunum eru í álitinum, og tilsamans verður neyðuga eykajáttanin í fyrstu atløgu 2-3 milliónir. Tá tær allar eru komnar í fasta legu, tørvar teimum einar 6-8 milliónir um árið aftrat teimum játtanum, setrið nú fær. Leggjast skal tó aftrat, at sjálvt við hesi øking leggja Føroyar væl minni pening í gransking og hægri lestur enn grannalond okkara.

Ein fortreyt fyri skilagóðari menning av setrinum er tó, at hølisspurningurin verður greiddur. Tá ið Fiskirannsóknarstovan um eini tvey ár flytur í onnur hús,

fær setrið heldur betri húsarúmd, men skulu vit gatuga eftir teirri tíðaraetlan, sum løgd er niðanfyri, verður hølistrot longu í 1987-88. Nevndin hevur ikki roynt at meta um neyðugu hølisútreiðslurnar, tí tað veldst alt um, hvørjar útbúgvingar verða settar á stovn og um hús verða leigað ella bygd til setrið.

Nevndin leggur dent á, at uppskotini um at menna granskíng og útbúgving á teimum ymsu økjunum eru heildir, sum illa býtast sundur, men eiga at byrja undir einum, skal fullgott gagn fáast burturúr.

Hesar heildir eru settar upp í talvuni niðanfyri. Hon sýnir eykaútreiðslurnar einstøku árini, meðan lesturin verður settur í gongd, og tá ið hann er komin í fasta legu. Ber ikki til at fáa neyðuga fígging, so at henda tíðaraetlan heldur, ber sjálvsagt til at broyta ætlanina, men nevndin leggur áherðslu á, at neyðugt er at taka avgerð um teir aðaltættir, sum eru í álitinum, og um hvørjar útbúgvingar, farið skal verða undir.

EYKAJÁTTAN TIL TÆR NÝGGJU ÚTBÚGVINGARNAR

mill. kr.

Tils.	Fíggjarár	Norðurl. serliga før. mát og bókm.	søga og siðsøga	samfelagsvísindi	Matverkf. Livfrøði	Ravnmagstokin teldu/hagf. alis/jarðfr.
		Ætlað útbúgvingarbyrjan	1987	1989	1986	1986
0,0	1986		0,0	0,0	0,0	0,0
		Játtað				
2,4	1987		0,3	0,6	0,5	1,0
4,1	1988		0,5	0,9	1,0	1,7
6,2-7,8	Fult framdur	0,0	0,5-0,8	2,0-2,3	1,5-2,0	2,2-2,7

Aftrat hesum koma smærri íløgur í víðkan av bókasøvnum.
felags teldútgerð og fyrisiting.

Í hesum áliti eru ymisk mál, sum meiri greiða má fáast á, men nevndin kennir seg vísa í, at hesi mál kunnu loysast so hvørt, og tey ivamál, sum eru viðvíkjandi lestraræetlanum eru øll seint í lesturinum aftan á grundútbúgvingina. Undir

flestu útbúgvingarnar er stødið longu lagt, og møguleiki skuldi tí verið fyri at byrja longu í 1986, um landsstýrið í høvuðsheitum tekur undir við álitinum.

Tórshavn 21. mars 1986

Undirskrivað: *Jóan Pauli Joensen formaður*

Sveinbjørn Bjarnsson

Svend Caspersen

Johan Djurhuus

Bogi Hansen

Hans Debes Joensen

Jóhan Hendrik W. Poulsen

Jóannes Rasmussen

Petur Zachariassen

Burturstaddir: *Reidar Djupedal*

Høgni Debes Joensen

/Maud Heinesen skrivari

INNGANGUR

Landsstýrið, ið varð skipað um áramótið 1984/85, setti í samgonguskjal sítt, at Fróðskaparsetur Føroya skuldi verða ment og víðkað. Í hesum sambandi vendi setrið sær í skrivi dagfestum 14. januar 1985 til landsstýrið við áheitan um, at nevnd varð sett við hesum setningi:

1. At gera uppskot til **dagføring av skipan setursins** við tí endamáli at **breiðka um vísindaliga** og **undirvísingarliga støði,** so at setrið hevur møguleika at fara undir gransking og útbúgving á fleiri økjum, sum tørvur er á í tí føroyska samfelagnum.
2. At skjóta upp eina **starvsskipan,** so at fólk uttanseturs við serkunnleika og

   førleika innan ávís øki kunnu knýtast at setrinum.

Landsstýrið tók alt fyri eitt undir við áheitan setursins *(skriv 23.1.1985)*, og Lassi

Klein landsstýrismaður setti hareftir nevndina við tí setningi og teim limum, setrið hevði skotið upp. Tilnevningarskrivið er dagfest *28. mars 1985,* og limirnir vóru:

Teir 3 limirnir í avgreiðslunevnd setursins: Jóan Pauli Joensen, Høgni Debes Joensen og Bogi Hansen.

Fyrrverandi limir í setursráð og avgreiðslunevnd: Hans Debes Joensen, Jóannes Rasmussen og Johan Djurhuus.

Umboð fyri setursdeildir: Jóhan Hendrik W. Poulsen og Petur Zachariassen.

Harumframt: Reidar Djupedal professari, Universitetet i Trondheim, Svend Caspersen rektari, Aalborg Universitetscenter, og Sigmundur Guðbjarnason professari, Háskóla Íslands.

Hesum seinasta barst frá, og eftir tilmæli hansara varð Sveinbjørn Bjørnsson professari, Háskóla Íslands, tilnevndur í staðin (skriv 23.5.1985).

Eftir uppskoti frá setrinum samtykti landsstýrið, at formaðurin í setursráðnum, Jóan Pauli Joensen, varð formaður í nevndini og Maud Heinesen skrivari.

Teir føroysku limirnir hava hildið fleiri fundir, og øll nevndin hevur havt tríggjar fundir í døgunum 2.-3.-juni, 30. nov, -2.des. 1985 og 20.-21. mars 1986. Á seinasta fundi varð nevndarálitið samtykt og undirritað. Í arbeiði sínum hevur nevndin fingið stuðul frá **undirnevndum**, sum hava verið settar til at greiða ymiskar spurningar. Limirnir í undirnevndunum eru nevndir í fylgiskjali 9, somuleiðis onnur, ið hava verið nevndini til handar.

VERANDI SKIPAN

Fróðskaparsetur Føroya varð stovnað í 1965. Til 1971 var bert hin eina deildin á setrinum, nevniliga Føroyamálsdeildin. Í 1971 varð stovnað ein heimspekideild, men hon varð longu niðurløgd í 1972, samstundis sum sett varð á stovn ein náttúruvísindarlig støðisútbúgving (Støðisútbúgvingin). Áður høvdu einans verið støk skeið á setrinum, men við støðisútbúgvingini varð skipað ein útbúgving, sum fekk útbúgvingarsamband við stovnar uttan fyri Føroyar. Í 1974 byrjaði eitt 1-árs prógvnám í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, ið eisini var ætlað sum partur av útlendskum universitetsprógvnámum. Hetta sama er galdandi fyri exam.art.- prógv í sama evni, ið stovnað varð í 1976. Í eini tvey ár hevði verið undirvíst í ávísum gudfrøðiligum greinum, og í 1978 varð stovnað ein gudfrøðideild, upprunaliga til at undirvísa til fyrra part í gudfrøði. Seinni er eisini stovnað exam.art.-nám í kristni/átrúnaði.

Allar deildir uttan niðurlagda heimspekideildin virka enn, og fleiri hava nomið hægri útbúgving á setrinum, sum tey hava lokið á øðrum lærdum háskúlum. Nøkur hava tikið hjágrein á setrinum aftur at høvuðsgrein frá lærdum háskúlum uttanlands.

Í løtuni eru 6 visindastørv á Føroyamálsdeildini, men tvey teirra eru ósett. Har er gransking í føroyskum máli, bókmentum og skaldskapi av munnamunni. Á

náttúruvísindaligu støðisútbúgvingini eru **4 vísindastarv**; eitt teirra hevur til knýti til Náttúrugripasavnið. Granskingin á náttúruvísindaligu deildini savnar seg í løtuni um **aðrar orkukeldur, kostkanningar** og **lívfrøðiligar kanningar** av føroyskum vistskipanum. Deildin hevur eisini **ráðgevingarvirksemi í teld.** Á gudfrøðideildini er eitt vísindastarv; **har verður føroysk kirkjusøga granskað.**

Umframt føstu lærararnar eru tímalærarar knýttir at øllum deildum setursins.

Sostatt eru tríggjar deildir ella stovnar á setrinum til tilsamans 11 vísindaligum størvum. Á øllum deildum mega námini verða samskipað við nám á norðurlendskum universitetum ella bundin í eina lestrarheild aðrastaðni. Fróðskaparsetrið kann ikki bjóða nakað nám, ið gevur fullan starvsførleika.

TØRVURIN Á HÆGRI ÚTBÚGVING OG GRANSKING

Nevndin hevur ikki gjørt nakra rættiliga greining og tørvinum í føroyska samfelagnum á gransking og útbúgving á universitetstigi. Slík kanning hevði í øllum førum verið ógvuliga ivasom og treytað av hugburði og meira og minni persónligum hugsanum. Hinvegin er tað greitt, at tørvurin í Føroyum neyvan er minni enn í grannalondunum, roknað í mun til t.d. bruttotjóðarframleiðsluna. Hetta er galdandi fyri hugvísindini, ið skulu granska og bera heilt sjálvstøðuga mentan, og hetta er galdandi fyri samfelagsvísindaligu, náttúruvísinda- og tøknifrøðiligu lærugreinirnar; menning teirra hevur stóran, um ofta ósæddan, búskaparligan týdning fyri samfelagið.

Tað er tí skilagott at bera íløgu Føroya í hetta øki við hana, onnur lond gera. Ísland og Danmørk nýta millum 0,6 og 0,8% av bruttotjóðarinntøkuni til granskingar- og lærustovnar, ið beinleiðis eru at sammeta við setrið (stovningarkostnaður er ikki viðtaldur). **Umroknað til føroysk viðurskifti samsvarar hetta við eina ársjáttan um 30-40 milliónir.** Ársjáttanin til Fróðskaparsetur Føroya, sum er einasti føroyski stovnurin av hesum slag, er ikki meiri enn um 8 milliónir. Tað ber til at kjakast um tað rætta í eini tílíkari prosentvísari samanbering, men líkt er til, at hon yvirmetir íløgu Føroya, tí at vanliga er munandi dýrari at stovnseta smærri eindir enn større, og av tí at Føroyar eru eftirbátur á hesum øki, verða kravdar munandi større íløgur at náa á hædd við grannalondini eftir rimiligari tíð.

Eitt annað eyðkenni fyri eini tílíkari meting er møguliga talið á lesandi. Tað er í Føroyum lutfalsliga høgt. **Árliga** taka **200-250 studentsprógv ella HF-prógv.** Hesi prógv eru í stóran mun vend ímóti framhaldsútbúgving á hægri lærustovni. Tørvur fer óivað altíð at verða á, at ein partur av teimum heldur fram við lestri uttanlands, men tað er hin vegin sjálsagt, at mong vilja heldur lesa her á landi, og møguleikar eru í Føroyum fyri at skapa nám, ið betur lúka treytirnar, føroyska samfelagið setur.

Nú kann onkur siga, at tað kostar Føroyum minni at senda námsfólk sítt av

landinum, men uttan at bera við politisk sjónarmið í hesum sambandi, minnir nevndin á tað virði, ið gransking og hægri útbúgving í Føroyum hava fyri samfelagið. Her verður hugsað um líkindini at skapa útbúgvingar, ið meira beinleiðis horva móti føroyska samfelagnum, og um vandan fyri at unglingar, ið nema lærdóm í útlondum, koma ikki heim aftur. Men uppaftur meiri virði man vera í tí týdningi, ið ein lærdómsstovnur hevur fyri landið við at mynda eitt umhvørvi og ein serkunnuleika, ið nútíðarsamfelagi er tørvur á. **Á hvørjum ári verða latnar nógvar milliónir krónur fyri serkøna hjálp úr útlondum, sum fyri ein part kundi verið lingin bæði ódýrari og betr innlendis.** Týdningin fyri samfelgið er ilt at gera upp í peningi, men royndir frá øðrum sýna, at greitt samband er ímillum íløgur í hetta økið og menning samfelagsins yvirhøvur.

Sæð úr vinnuligum sjónarmiði, kann eisini verða víst á ta støðu, føroyski útflutningurin er komin í. Markið fyri vøkstri í nøgd er nógvastaðni um at vera rokkið, og tað sýnist at vera almenn semja um, at samfelagið í størri mun eigur at miða ímóti betur at **gagnnýta tað tilfeingi, ið er.** Her ræður um at góðska gomlu framleiðsluna, finna henni betri marknað og at menna nýggja framleiðslu. Í hesum støði er tað vanlig roynd frá øðrum londum, størri sum smærri, at **ein avgerandi treyt fyri tílíkari menning er nóg stórt tal á væl útbúnum fólki.**

UPPSKOT TIL ÚTBÚGVINGARSKIPAN

Nevndin hevur ikki sæð tað sum setning sín at skapa eina lidna skrá yvir nám. Tvørturímóti má heldur verða stevnt móti eini skipan, ið tryggjar liðiligar víðkanarmøguleikar frameftir. Í eftirfylgjandi parti verður greitt frá teirri skipan, ið nevndin heldur hóska best fyri Føroyar, sum er. Vit hava harumframt hildið tað verið rætt at vísa á nakrar námsgongdir í eftirfylgjandi bólkum, bæði til at vísa, hvussu fylt kann vera í rammurnar, og tí at tær gongdir, sum verða lýstar, verða hildnar vera so týðandi fyri føroyska samfelagið, at tær eiga at verða settar á stovn, so skjótt sum líkindi eru til tess. Námini, sum skotin er upp, kunnu verða býtt sundur í nám, ið eru vend móti vinnuni og meira ástøðilig nám. Nevndin er sannførd um, at í einum so lítlum samfelag sum tí føroyska, er rættast í størst møguligan mun at samskipa tey ymsu námini, og í teim stutt lýstu uppskotunum er hetta gjørt, uttan at tað eftir nevndarinnar meting nervar útbúgvingardygdina. Samstundis skapar henda skipan betri møguleikar hjá teim lesandi at velja tað rætta námið og at skifta nám.

Tað eigur at verað undirstrikað, at niðanfyri standandi uppskot uttan iva skulu lagast til, men nevndin metir, at tey eru so mikið væl greind, at mett kann verða um tilfeingiskrøvini, og at í meginheitum kann støða verða tikin til, nær tey ymsu námini kunnu verða stovnsett.

ALMENN SKIPAN

Sum grundútbúgving við Fróðskaparsetur Føroya skjýtur nevndin upp bacalau-

reus-útbúgvingarnar (B.A., B.S.), ið taka trý til hálvt fjórða ár.

Í hugvísindaligum og náttúruvísindaligum námsgreinum fer útbúgvingin at samsvara við baccalaureus-stig í stórum parti **av ensktalandi av heiminum** og hevur serliga ta **íslendsku skipanina sum fyrimynd.** Í tøknifrøðiligum lærugreinum verður miðað ímóti einum stigi, ið samsvarar við **akademiverkfrøðinám í Danmark og M.S.** (Eng.) í Bretlandi.

Aftan á grundútbúgvingina skal vera møguleiki fyri framhaldi. Møguligt skal vera at røkka **cand.phil.** -stigi við afturat einum baccalaureus-stigi at leggja eitt serbúgvingarár, ið serliga skal snúgva seg um at skriva sermitgerð undir leiðbeining av einum ella fleiri lærarum. Serbúgvingarárið verður einstaklingskent fyri hvønn lesandi og skal í hvørjum føri sær verða góðkent av avvarðandi megindeildarráð.

Í fyrsta umfari verður neyvan møguligt at bjóða serbúgvingarár fyri allar útbúgvingar, men í **føroyskum máli og bókmentum eigur hesin møguleiki at standa øllum lesandi í boði,** og úrslitið av hesum lesetri verður tá at rokna javnt við høvuðsgreinarlestur, sum longu nú meginavgerð er tikin um at stovnan á setrinum.

Nevndin heldur haraftrat, at Fróðskaparsetur Føroya skal kunna veita stigið **cand.mag.** til tann, ið hevur tikið cand.phil.-stig á setrinum og kann sama **nóg gott avrik í 2-ára lestri í aðrari námsgrein,** annaðhvørt á setrinum ella á lærustovni uttanlands. Í hvørjum einstøkum føri verður hetta at góðkenna av megindeildarráð.

Sum ískoyti til hesar longru útbúgvingarnar eigur at vera møguleiki fyri, at lesandi kunnu gevast við útbúgvingini uttan at hava fullført hana og fáa **góðskrivað læruna á einum stovni uttanlands.** Serligan týdning hevur tað, at avtalur, deildir á setrinum hava við aðrar norðurlendskar lærustovnar, verða varðveittar. Her verður serliga hugsað um møguleikan at halda fram uttanlands við fullari góðskriving aftaná tvey ára lestur.

Uppritaða skipanin skapar samstundis møguleika fyri, at setrið skipar fyri undirvísing og leiðbeining í serstøkum føroyskum evnum fyri lesandi, sum hava lisið ella lesa við útlendskar stovnar. Her verður fyri ein part hugsað um, at lærarar á setrinum (innan- og uttanseturs) virka sum leiðbeinarar við sermitgerðarbeiði, og lutvíst við beinleiðis skeiðvirksemi.

Niðanfyri verða tey einstøku høvuðsøkini í álitinum frá nevndini viðgjørd hvørt sær.

Yvirlit yvir námsgreinirnar er víst á ritmynd 1.

HUGVÍSINGALIGAR LÆRUGREINIR

Nevndin skjýtur upp í fyrsta umfari at avmarka undirvísingina til tær vísindagreinir, sum longu nú verður undirvíst ella granskað í á Fróðskaparsetri Føroya ella á øðrum hugvísindaligum granskingarstovnum (smbr. fyligskjal 2). Skotið verður upp at byrja við

Norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum **sogu og siðsogu**
Av hesum er hin fyrra longu stovnað á Fróðskaparsetrinum, Søga og siðsøgn er harafturímóti nýggj lærugrein, sum eigur at byrja undirvising á heysti 1987. Seinni kunnu onnur nám koma aftrat.

Námini verða skipað sum **2-ára grundútbúgvingar** við **einum framhaldsári til B.A.-prógv** og við møguleika fyri at halda fram við serbúgving eitt ár.

Grundútbúgvingin skal fevna um vísindaástøði og undirstøðupartar av frøðiligum **námsháttalag** og granskingarlag. Tá ið tað er ynskjandi, eigur fyrra árið av grundútbúgvingini at vera lagt til rættis sum sjálvstøðugt prógvnám, ið samsvarar við eitt ársverk.

Framhaldsnámið eigur at verða á **hægri lærdómsstigi** enn grundútbúgvingin, og eftir serligum ásetingum, ið galda fyri hvørt námið sær, skal kunna bera til at velja evni sum tilvalsgreinir upp til eitt ársverk frá aðrari nærskyldari námsgrein, sum kann samskipast við heildina í framhaldsnáminum. Eisini skal kunna bera til at leggja tættir inn í framhaldsnámið, sum miða ímóti ávísum atvinnustørvum, og lestrartíðin verður longd samsvarandi.

Núverandi **gudfrøðilestur** eigur at verða skipaður undir hugvísindaliga økið.

Tað vil so vera, at **kandidatar** við útbúgving, sum í høvuðsheitum byggir á føroyskt mál, bókmentir, søgu og siðsøgu, hava **avmarkaðar møguleikar** at nýta útbúgving sína aðrastaðni enn í Føroyum. Onkur einstakur kann tó verða settur í starv á lærdum háskúla, eitt nú sum lærari í føroyskum.

Harafturímóti er **tørvurin stórur í Føroyum. Eitt eyðsýnt starvsøki er undirvising í føroyskum á studentaskúlunum og HF-skeiðunum**, serliga um kandidatútbúgvingin í føroyskum verður samanbundin við eina aðra lærugrein, sum har verður undirvist í. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at **ætlanir eru um at spjaða útbúgvingina av 16-19 ára gomlum út um landið, og tað kann fara at geva lærarum við hægri útbúgving fleiri starvsmøguleikar.**

Umframt hetta eiga eisini at vera aðrir starvsmøguleikar hjá fólki við B.A.-prógvi, eitt nú **í útvarpi, sjónvarpi, forlagsyrki, á granskingarstovnum og í fyrisiting**, bæði almennari og møguliga eisini í vinnulívinum.

Útbúgvingarnar kunnu somuleiðis hugsast at hava áhuga hjá fólki í starvi, ið vilja búgva seg betur út.

Í mong ár hevur verið undirvíst í norðurlendskum, serliga **føroyskum** máli og bókmentum sum 2-ára námi fram til **exam.art.-prógv**; fyrra árið endar við sjálvstøðugum prógvi. Henda grundútbúgving eigur at verða varðveitt við einum framhaldi eftir reglum, sum **skotið** er upp í fylgiskjali 3.

Lesandi, ið hava tikið støðisár og eftirfylgjandi ár við nógg góðum úrsliti, kunnu fáa skjalprógv fyri, at tey havi rætt til exam-art.-heiti.

Neyðug játtan er til **størv** og útreiðslur til at byrja fult nám á royndarstigi.

SØGA OG SIÐSØGA

Í fyrsta syftu eigur at verða stovnað samanhangandi 2-ára **grundútbúgving, og**

dentur lagdur á **føroyska søgu** og **siðsøgu. Í ástøðiliga** partinum eigur at verða arbeitt við bæði **søguligum og siðsøguligum** námsháttalagi. Í fylgiskjali 4 er grundútbúgvingin nærri lýst.

Eftir lokna grundútbúgving kann tann lesandi halda fram at lesa á **øðrum lærdum háskúla uttan fyri Føroyar.** Fróðskaparsetrið hevur longu tikið upp samband við Aarhus Universitet um henda spurning. Tann seinasta partin av lestrartíðini kann tann lesandi koma aftur til Føroya og skriva sertritgerð hjá lærara her, um ritgerðarevnið hoyrir undir hansara evnisøki. Hesin møguleiki eigur eisini at standa øðrum lesandi í boði.

Tá ið neyðugar royndir eru fingnar í grundútbúgvingini, eigur at verða **stovnað 1-ára framhald** og møguliga serbúgvingarár.

Játtað er eitt undirvísingarstarv í søgu, sum verður sett summarið 1986. Til grundútbúgvingina krevjast harumframt **3-5 uttanseturs lærarar og ein gestalærari í hálvum starvi á byrjanarstiginum.** Harafturat koma rakstrarútreiðslur, soleiðis at eykaútreiðslurnar verða uml. *300.000 kr.* fyrsta árið og *500.000 kr.* tá ið námið er fult framt. Tá ið framhaldsnám byrjar, eigur eitt vísindastarv afturat at verða sett.

Á ritmynd 2 er skiapnin fyri tær hugvísindaligu lærugreinirnar víst í høvuðsdráttum.

SAMFELAGSVÍSINDALIGAR LÆRUGREINIR

Mótsett hugvísindaligu og náttúruvísindaligu megingreinum verður hvørki undirvíst ella granskað á **samfelagsvísindaligu** økinum á Fróðskaparsetrinum. Ei heldur er nakað starv sett á hesum øki. Tí er einki grundarlag at byggja fullfíggjaða útbúgving á.

Nevndin heldur tó, at tað føroyska samfelagið eins væl og onnur hevur tørv á gransking og útbúgving, ið eru lagað eftir okkara samfelag og ikki grannalondunum. **Stórur tørvur er á kunnleika um hetta samfelag, eitt nú um búskaparlig og politisk viðurskifti, bygdamenning, lóggávu o.a.** Tað er tí ein eyðsæð uppgáva hjá eimum granskingar- og undirvísingarstovni at útvega og bera tílíkan kunnleika.

Í fyrstu syftu heldur nevndin tað vera rætt at byrja við at **stovna 2-ára samfelagsvísindaliga støðisútbúgving** sum fyrireiking til endaligt prógvnám. Dentur eigur at verða lagdur á at læra tey lesandi **meginreglurnar fyri samfelagsvísindaliga ástøði og námsháttaløg,** sum kunnu nýtast sum støði undir framhaldslestri á Fróðskaparsetrinum og uttanlands. (Í frymlinum er serliga hugsað um Noreg, Svøriki, Ísland og Danmark). Harumframt skulu tey lesandi hava høvi til at royna hesi ástøði og námsháttaløg í føroyskum viðurskiftum.

Tá ið henda útbúgving hevur virkað eina tíð, er grundarlag fingið undir at meta um, hvussu hon best verður fullbygd til endaligt prógv. Nevndin vil ikki sum er seta fram uppskot um, hvussu samfelagsliga útbúgving eigur at verða skipað til innihald og longd, men heldur tó, at endaligt prógv skuldi kunnað

verið givið eftir trý til hálvfjórða ára lestur. Her verður hugsað um **H.A., vinnulívsløgfrøði og tílíkar útbúgvingar.** Hesar útbúgvingar mugu haldast at kunna verða góðskrivaðar fult og heilt í kandidatútbúgvingum í Danmark, og eisini skuldu møguleikar verið fyri at knýtt saman við fiskivinnuútbúgvingar, eitt nú fiskivinnukandidatsnúmið í Tromsø.

Til at **standa fyri undirvísingini í samfelagsfrøðiligu støðisútbúgvingini má serlig deild setast á stovn** við ávísum tali av fólki til undirvísing og gransking. Deildin kann eisini standa fyri **serundirvísing** í føroyskum samfelagsviðurskiftum fyri kandidatar við útlendskari útbúgving. Her kann verða hugsað um føroyskt serlestrarskeið eina ella tvær lestrarhálvur.

Nærri grundgeving fyri útbúgvingini og lýsing av, hvussu hon kann verða skipað saman við dømum um granskingarevni, er sett upp í fylgiskjali 6.

Við tað at hetta námsøki ikki sum hini longu hevur støði á setrinum at byggja á, er ikki so eyðgjørt at fáa tað í lag. Nevndin hevur í fylgiskjali 6 skotið upp ein framferðarætlan, sum í fyrstuni skal leggja høvuðsdent á at útbúgva møguligar lærarar við at **stovna granskingarstyrkir.** Eftir hesum uppskoti eru árligu útreiðslurnar fyrstu tiðina um *500.000 kr.* vaksandi til *2-2,5 mill. kr.* tá ið fullbygt er. Samfelagsvísindaútbúgvingarnar eru so statt heldur dýrari at fáa á stovn enn hinar; tað kemst fyrst og fremst av, at tær mega verða bygdar upp frá botni. Afturfyri fæst so samtíðis eitt samfelagsvísindaligt granskingarumhvørvi, ið fær nógv at týða fyri føroyska samfelagið og menning tess.

NÁTTÚRUVÍSINDALIGAR OG TØKNIFRØÐILIGAR LÆRUGREINAR

Lesturin á hesum báðum evnisøkjum er skiftur í tvær høvuðsgreinir við bert lítlari umskaring í undirvísingini. Evnafrøði/lívfrøði er onnur høvuðsgreinin, hin fevnir um tøknifrøðiligan lestur, støddfrøði, alisfrøði/jarðalisfrøði og teldufrøði.

Lívfrøðiliga lærugreinin hevur felags støðisár við felags grundnámsgreinum og studulsgreinum. Harumframt er 30 % av øðrum lestrarári eisini felags. Innihaldið í hesum bólkinum er víst á ritmynd 3. Hin parturin av náminum er býttur sundur í tvær lestrargreinir: matvørkfrøði og B.S. í lívfrøði. Í tí valfría partinum av báðum námunum kann tó verða nakað av umskaring í undirvísingini.

Matvørkfrøðiútbúgvingin tekur hálvtfjórða ár og miðar ímóti føroyska matvøruídnaðinum (vørumenning, vørustýring) og eftirliti; serligur dentur verður lagdur á evni innan fyri fiskiídnaðin. Útbúgvingin er vend ímóti vinnulívinum, meu samstundis er ástøðið so mikið høgt, at hon best kann sammetast við (akademi) verkfrøðiútbúgving. Á mynd 3b er neyvari lýsing av náminum eftir støðisútbúgving. Tó verður gjørt vart við, at uppskotið um lestur eftir støðisútbúgving krevur at verða nærri viðgjørt, áðrenn undirvísingin byrjar.

B.S. í lívfrøði er natúrlig **víðkan av støðisútbúgvingini** í lívfrøði og evnafrøði, sum verið hevur síðan 1980 á Støðisútbúgvingini. Útbúgvingin hevur, sum áður nevnt, felags støðisútbúgving, saman við matverkfrøðiútbúgvingini, og framhaldsnámið er víst á mynd 3c. B.S.-útbúgvingin í lívfrøði er vend móti føroyska samfelagnum, partvíst undirvísingarverkinum, men meira vinnulívinum. Her verður ikki hugsað um serligar vinnugreinir, men um uppgávur í sambandi við havbúnað, landbúnað, umhvørvisspurningar og meira greiningarkendar spurningar í ídnaðinum. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at í Íslandi verða útbúnir uml. 290 kandidatar eftir samsvarandi skipan, og at allir hava starv, fyri ein stóran part í vinnulívinum. Við hesum í huga er tríðja lestrarárið serliga ætlað at savnast um lívfrøðiligar spurningar av serligum áhuga í Føroyum, bæði á sjógvi og landi. Tey bæði fyrstu námsárini fiest viðtøk inngangsleiðsla í lívfrøði, og tey skulu kunna verða góðskrivað sum 2-ára fyrsti partur á lærdum háskúlum í Norðurlondum hjá lesandi, sum halda fram at lesa uttanlands, men full B.S.-útbúgving skal eisini kunna geva møguleika fyri at halda fram t.d. til M.S.-stig.

Av tí at uppskotið byggir á núverandi støðisútbúgving, kann felags støðisútbúgvingin fyri báðar greinir (mynd 3a) í høvuðsheitum verða borin av núverandi játtanum. Til at stovna matverkfrøðiútbúgvingina eigur at verða roknað við tveimum føstum lærarum afturat og umleið 10 uttanseturs lærarum. Aftur at hesum kemur rakstur og tólbúnaður, og árligu eykaútreiðslurnar til hesa útbúgving verða metar til *1-1,5 mill. kr.*

Til B.S. í lívfrøði skuldi ikki verið neyðugt at sett fleiri størv til at byrja framhaldið, men einir 10 uttanseturs lærarar eiga at verða knýttir at útbúgvingini og eisini gestalærarar í ein vissan mun. Við útreiðslum til tólbúnað og rakstur verða eykaútreiðslurnar til hesa útbúgving mettar til uml. *500.000 kr.* til samans.

Tøknifrøðilig nám og nám í støddfrøði, alisfrøði/jarðalisfrøði og teldufrøði. Í hesum evnisbólki verður skotið upp at stovna verkfrøðiútbúgving og B.S.-útbúgving við ymsum møguleikum fyri vali av lestrargrein. Tey bæði fyrstu lestrarárini er undirvísingin fyri ein stóran part felags (90 % fyrra árið og 60 % seinna árið). Innihaldið í felagsnáminum er víst á mynd 4a.

Verkfrøðiútbúgvingin: Skotið verður upp í fyrsta umfari at byrja verkfrøðiútbúgving í **ravnmagnstøkni.** Uppskotið byggir fyri ein stóran part á álitið, sum Magnus Danielsen lic.techn. gjørdi fyri Fróðskaparsetur Føroya í 1977. Í árunum sum farin eru, er støðisútbúgvingin broytt meira í samljóð við tað upprunaliga uppskotið, og nevndin hevur í samstarvi við Magnus Danielsen lagað tað til soleiðis, at tað gongur inn sum ein náttúrligur partur av undirvísingarskipanini (smbr. fylgiskjal 8).

Í upprunaliga uppskotinum hjá Magnus Danielsen vórðu nevndar fleiri verkfrøðiútbúgvingar enn í hesum álitinum, og sum vera man verða møguleikar fyri at víðka við fleiri greinum í framtíðini. tá nevndin hevur valt at seta ravnmagnsfrøði fram um aðrar greinir, er tað fyri ein part tí, at soleiðis varð eisini skotið upp í tí upprunaliga uppskotinum, og partvíst tí at semja er um, at tað ivaleyst fer at krevja nógvar ravnmagnstøknifrøðingar við verkfrøðiútbúgving at menna íðnað og framleiðslu í Føroyum.

Avgerandi fyri hesa raðfesting okkara hevur verið, at vit eru sannførdir um, at henda lestrargreinin er tann, sum best kann samskipast við núverandi undirvísing á Fróðskaparsetrinum, og at hon krevur minst tilfeingi at stovna. Nevndin kann ikki mæla til, at fleiri verkfrøðiútbúgvingar verða stovnaðar frá byrjan, men heldur, at við teirri skipan, sum skotið er upp, ber til at víðka útbúgvingarnar, tá ið royndir og tilfeingi eru til tað.

Umframt felags byrjanarlestur verða skeið hildin, sum partvíst kunnu nevnast tøknifrøðiligar grundgreinir (TG), sum eru felags fyri allar sergreinir, partvíst sum serbúgvingargreinir (SG). Harafturat koma handilsligar kærugreinir og verkætlanir (smbr. fylgiskjal 8).

Í uppskotinum verður roknað við fýra sergreinum innan fyri ravmagnstøkni; tó er ikki neyðugt, at tey byrja samstundis. Tey eru: sterkstreymstøkni, fjarskifti, ravmagnsfrøði og tólbúgving, teldutøkni og stýring.

Av tí at henda útbúgving hoyrir til tær styttru útbúgvingarnar, eigur at verða virkað fyri, at kandidatar við hesi útbúgving hava góðar møguleikar fyri framhaldslestri. Hetta metir nevndin skuldi borið væl til í ensktalandi londum, har útbúgvingar sum hendan er tað vanliga, og eisini í Norðurlondum — t.d. skuldu góðir møguleikar verið á Aalborg Universitetscenter at hildið fram við sivilverkfrøðiútbúgving.

B.S. í alisfrøði/jarðalisfrøði er náttúrligt framhald av núverandi støðisútbúgving. Kandidatar við hesi útbúgving kunnu umframt í undirvisingarverkinum fáa starv í vinnulívinum. Hetta er ikki so nógv roynt í Danmark, men haraftur imóti í Bretlandi og USA, og sum gongdin er í samfelag okkara, kann roknast við, at tørvurin verður stórur. Tað kann t.d. hugsast, at kandidatar við hesi útbúgving kunnu fáa størv og uppgávur, sum verkfrøðingar vanliga røkja, men samstundis skulu kandidatar útbúgvast við kunnleika til jarðalisfrøðiligar spurningar. Her verður hugsað um uppgávur í sambandi við umhvørvisspurningar og nýtslu av tilfeingi í undirgrundini. B.S.-útbúgvingin er endalig, men er skipað soleiðis, at hon skal geva upp til fulla góðskriving í framhaldslestri uttanlands, annaðhvørt til t.d. cand.scient. í Norðurlondum ella M.S. aðrastaðni.

Tað frøðiliga innihaldið í útbúgvingini er víst á mynd 4c og fevnir um skeið og verkætlanir umframt felagsstøðisútbúgving. Ein partur av skeiðunum eru **kravd** skeið, onnur valskeið, tó soleiðis, at **megindeildarráðið** skal góðkenna loyvdar **samansetingar**.

B.S. í hagfrøði/teldufrøði: Námið miðar ímóti **støruum** bæði í **vinnulívinum og hjá tí almenna.** Partvíst verður hugsað um **hevdbundnar** arbeiðsuppgávur í sambandi við **rakstur og umsiting av teldukervum**, partvíst **talviðgerð á hægri stigi.** Kandidatarnir skulu eisini kunna loysa **uppgávur** bæði hjá tí almenna og øðrum, og skulu saman við t.d. verkfrøðingum kunna vera við í tilrættisleggingar- og **menningarverkætlanum.** Longu nú verða **teldufoirit útflutt úr Føroyu,** serliga til fiskivinnuna, og **útbúgvingin,** ið her er skotin upp, kann koma hesi vinnugrein til góðar.

Tað frøðiliga innihaldið í hagfrøði/teldufrøðiútbúgvingini er víst á mynd 4d. Umframt felags lestrarbólkin á mynd 4a eru eftirverandi skeið tríggjar tær fyrstu lestrarhálvurnar saman við B.S.-náminum í alisfrøði/jarðalisfrøði. Hin undirvísingin verður útfylt við skeiðum og verkætlanum í **lærugreinum** innan hagfrøði og teldufrøði.

Nevndin heldur, at henda hugsaða útbúgvingin í stóran mun fer at kunna nøkta tørvin á telduøkinum. Vit mugu tó viðganga, at hon á ongan hátt kann nøkta allan tørvin, ikki minst tí handilslærugreinirnar eru sera avmarkaðar. Tá nevndin hevur valt at taka hesa útbúgving framum, kemst tað av tí, at hon í stóran mun kann samskipast við aðra undirvísing á Fróðskaparsetrinum, og tilfeingiskrøvini verða ti munandi minni.

Nevndin heldur tó eisini, at partur av B.S.-útbúgvingini í hagfrøði/teldufrøði fer at kunna vera partur av øðrum útbúgvingum, sum meira venda sær til ta handilsligu nýtsluna av teld. Ein kundi eisini hugsað sær, at tey lesandi kundu tikið lut í øðrum námum á setrinum ella øðrum útbúgvingarstovnum. Á tann hátt kundi hetta uppskot verið mennandi fyri teldundirvísingina á víðari øki.

Tá felags lestrarbólkurin til allar **tøknifrøðiligar/náttúrufrøðiligar** lestrargrein ir er partur av núverandi **støðisútbúgving,** krevur omanfyri nevnda uppskot bert eykajáttanir til henda bólkin.

Til ravmagnsverkfrøðiútbúgvingina eiga í fyrsta umfari at verða knýtt **tvey føst vísindalig støru,** eini **10 uttanseturs lærarar** og ein útlendskur **gestalærari í hálvum starvi.** Haraftrat koma tólbúnaður og rakstur, og árligu eykaútreiðslurnar til hetta nám verða tilsamans mettar til *1-2,5 mill. kr.* (Hetta er tó ikki nóg mikið til allar 4 lestratgreinir, sum skotið er upp í fylgiskjali 8).

Til B.S.-námið í alisfrøði/jarðalisfrøði átti ikki at verið neyðugt at sett fleiri føst støv, men uml. **10. uttanseturs lærarar** eiga at verða knýttir at náminum, við raksta og tólbúnaði verða eykaársútreiðslurnar mettar til *uml. 500.000 kr.* tilsamans.

Til B.S.-námið í hagfrøði/teldufrøði eigur at verða sett **eitt fast vísindaligt** starv. Hartil koma **5-10 uttanseturs lærarar. Eykaársútreiðslurnar** verða mettar til **uml. 750.000 kr. tilsamans.**

ONNUR NÁM

Omanfyri nevndu útbúgvingar eru **allar á universitetsstigi.** Umframt tað eigur møguleiki at vera fyri at stovna útbúgvingar **á lægri stigi** ætlaðar starvi í vinnulívinum. Her verður serliga hugsað um útbúgvingar, sum innihalda partar av núverandi ella uppskotnum námum á setrinum. Hesar útbúgvingar kunnu hugsast annaðhvørt at hoyra undir setrið ella verða fyriskipaðar í samstarv millum setrið og aðrar útbúgvingarstovnar.

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at Føroya Blaðmannafelag hevur arbeitt við ætlanum um at gera eina útbúgving annaðhvørt á setrinum ella í samstarvi við setrið. Møguleikar áttu at verið fyri at stovna tílíka **fjølmiðlaútbúgving.**

Læraraeftirútbúgving hevur serligan áhuga. Hon hevur higartil verið á Fróðskaparsetrinum, men tað hevur verið borið upp á mál at leggja ábyrgdina av henni uttan fyri setrið. Tá hetta mál í løtuni verður viðgjørt bæði fræðiliga og politiskt, tekur nevndin ikki støðu til tað, men vísir á, at ein stórur partur av teimum skeiðum og útbúgvingartilboðum, sum eru lýst omanfyri, kunnu skipast sum partur av læraraeftirútbúgvingini.

Nevndarlimirnir H.D. Joensen, Jóannes Rasmussen og Johan Djurhuus hava lagt fyri nevndini uppskot um **eitt 1-árs grundskeið í heimspeki og føroyskari mentan.** Skeiðið er eitt opið tilboð og ætlað teimum, sum fegin vilja ogna sær eitt rúmari alment útsýni millum hina vanligu skúlagongdina og eina meira bundna, miðvísa útbúgving á hægri stigi, og teimum, sum annars hava áhuga fyri hesum evnum, sí fylgiskjal 5. Nevndin mælir til, at hetta uppskot verður sett í verk.

Nevndin mælir harumframt til, at stovnað verður **ársnám í føroyskum** á Fróðskaparsetrinum **fyri útlendingar (skjalsnám).** Hetta nám skal kunna góðskrivast á øðrum lærdum háskúlum og eigur at fevna um byrjanarundirvísing í talaðum og skrivaðum føroyskum máli, føroyskari málfrøði, føroyskum hókmentum og føroyskum samfelag og mentan tess.

LÆRARAR

Høvuðstreytin fyri hægri undirvísing í Føroyum er ivaleyst spurningurin um at fáa lærarar við fræðiligum kunnleika á nóg høgum stigi. Setrið kann uttan iva í ein vissan mun fáa hjálp frá útlendskum lærarum, men tann skipanin kann ikki vera álitið hjá einum hægri lærustovni. Neyðugt er at hava eitt minstatal

av vísindaligum starvsfólki á hvørjari deild, um hon ikki skal stirðna.

Eitt húskandi tal av hesum fólkum eigur at hava fast starv á setrinum, og størvunum skal fylgja bæði rættur og skylda til gransking í teirri lærugrein, sum undirvíst verður í. Hetta er neyðug treyt fyri, at undirvísingin verður á nóg høgum stigi, samstundis sum granskingin í sjálvari sær sum frá líður fær stóran týdning fyri samfelagið, eisini búskaparliga.

Sum støðan er, hevði verið neyðugt at økt talið á vísindaligum starvsfólki á Fróðskaparsetrinum, um starvsfólkið einsamalt skuldi tikið alla eykaundirvísing upp á seg, sum skotin er upp í hesum áliti. Nevndin heldur tað vera sera umráðandi, at tey mongu uttan fyri setrið við akademiskari útbúgving verða drigin upp í undirvísingina. Hetta liggur eisini í setningi nevndarinnar. Vanliga verður tað hildið at vera óheppið, at stórur partur av undirvísingini verður røktur av uttanseturs lærarum, og tað er greitt, at tað hevur nógvar vansar, men hin vegin kann tað styrkja sambandið millum teir ymsu stovnarnar, sum hava gransking, og tað kann stimbra granskingina. Somuleiðis kann tað skapa betri viðurskifti við vinnulívið, og tað er nøkrum av útbúgvingunum fyritreyt fyri góðum úrsliti. Tað munar mest, at neyvan fer at bera til at fáa nóg mikið av frøðiliga fullførum lærarum uttan eisini at fáa fólk frá øðrum stovnum.

Ein skipan sum henda við lutfalsliga stórum parti av lærarunum uttan fyri setrið krevur, at ávísar treytir eru loknar, skal hon virka eftir ætlan. Í fyrsta lagi mega uttanseturs lærarar lúka somu krøv til yrkisførleika sum teir, sum eru í føstum starvi á setrinum, og høvuðsstarv teirra má í høvuðsheitum vera av tílíkum slag, at teir kunnu varðveita nóg høgt frøðiligt stig. Her verður serliga hugsað um tey, ið starvast á almennum stovnum, sum fremja gransking.

Uttanseturs lærarar mega tó hava fast tilknýti til setrið. Hetta er neyðugt, partvíst at tað skal kunna bera til at leggja ráð um undirvísingina, partvíst at vissa kann vera fyri, at ráðleggingin fevnir nóg víða. Av somu orsøk eiga uttanseturs lærarar eisini at vera umboðaðir í ráðunum fyri setrið.

Støddin á føstum viðbótum til uttanseturs lærarar verður eyðvitað ásett í samráð við landsstýrið, men nevndin hugsar sær eina upphædd um leið 10.000 kr. til støddar um árið til lektarar og nakað meira til professarar.

Umframt fast tilknýttar uttanseturs lærarar eigur til undirvísing, ið ikki er so frøðiliga krevjandi, undirvísingarhjálp at kunna fáast frá undirvísingarhjálparum. Teir hava einki formligt tilknýti til setrið og fáa bert tímaløn fyri ta undirvísing, teir hava. Teir nýtast ikki at verða mettir av serkønari nevnd.

Í fyrstani kann á summum frøðiøkjum verða torført at finna nógvar lærarar við neyðugum yrkisførleika. Her kann hugsast, at undirvísingin innan fyri ávist mark verður í hondunum á undirvísingarhjálparum við leiðbeining frá einum lektara/professara (í føstum starvi ella uttanseturs), ið eisini hevur ábyrgdina.

Umframt lærarastørv, sum nevnd eru omanfyri, má eisini roknast við einum ávísum tørvi á gestalærarum frá útlendskum stovnum, serliga tey fyrstu árini.

STARVSLAG
Ítøkiliga verða hesi starvsløg uppskotin:

Lærarar í føstum starvi á setrinum verða nevndir **professarar og lektarar.** Haruminnframt eiga at vera útbúgvingarstørvini **adjunktur og granskingarstyrkhavi.** Arbeiðsbyrði teirra verður skift í gransking, undirvísing og fyrisiting eftir nakað somu reglum sum í øðrum Norðurlondum.

Uttanseturs lærarar eru **uttanseturs professarar og uttanseturs lektarar.** Teir skulu, eins og lærarar í føstum starvi, metast av serkønari nevnd, áðrenn teir formliga kunnu verða knýttir at setrinum og fáa nevndu heiti. Teir verða løntir við fastari mánaðarviðbót aftur at teirri løn, teir fáa á arbeiðsstaði sínum (uttanseturs professarar eftir hægri stigi enn uttanseturs lektarar). Afturfyri hava teir skyldu til at taka lut í ráðlegging um undirvísingina, og teir geva tilsøgn um at undirvísa í givnan mun, tá ið tørvur er á tí. Tá ið uttanseturs lærarar undirvísa, fáa teir tímaløn umframt ta føstu viðbótina. Tilknýti hjá uttanseturs lærarum má sjálvandi vera **í semju við stovnarnar,** har sum teir hava høvuðsstarv sítt.

GRANSKING
Lærarar á setrinum nýta eins og vanligt er aðrastaðni í mesta lagi helvtina av arbeiðstíð sini til undirvísing. Hin parturin er ætlaður til **gransking** umframt nakað av fyrisiting. Hjá summum lærarum, ið hava serligar skyldur at røkja, kann verða minkað um undirvísingarpartin.

Í hugvísindum er gransking á Føroyamálsdeildini í **orðabókaarbeiði, fólkaminnum, skaldskapi av munnamunni, málsførum, staðanøvnum og bókmentum.** Stórur partur av granskingini er **innsavning, skráseting og skjalfesting.**

Líkt **granskingarvirki** er eisini á **Føroya Fornminnissavni og Føroya Landsskjalasavni.** Stevnt eigur at verða móti **skipaðum samstarvi millum setrið og hesar stovnar í fólkalívsfrøði og fornfrøði.**

Mælt verður til, at verkætlan í føroyskari orðabókagerð við nýtslu av nútíðartøkni fær serligar søndir.

Granskingin á Støðisútbúgvingini fevnir um kanning av **føroyskari náttúru og føroyskum umhvørvi,** eitt nú kanning av vindi og streymi. Í granskingarvirkseminum er **samstarv við Fiskirannsóknarstovuna og Náttúrugripasavnið.** Samstarv er eisini fingið í lag við Landsverkfrøðingin og Orkuráðið um ávísar verkætlanir.

Við teimum útbúgvingum, sum skotnar eru upp, verður sum frá líður bygdur upp ein serkunnleiki á náttúruvísindaliga og tøknifrøðiligga økinum bæði við føstu lærarunum og uttanseturs lærarunum. Hesin serkunnleiki eigur eisini at koma til góðar í ráðgevingararbeiði setursins, men umráðandi fyri dygdina í hesi ráðgeving er, at ein úvís **grundgransking** verður framd.

Ein nýggjur táttur er samfelagsfrøðilig gransking. Endamálið við henni er at

vinna kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti, føroyskan búskap, bygdamenning og føroyska lóggávu. Eisini er samfelagsvísindaligur kunnleiki neyðugur til at meta um, hvørja ávirkan samfelagsviðurskifti uttanfyri fáa hjá okkum og til at leggja støði undir óhefta ráðgeving til myndugleikar, felagsskapir og virki. Í fyrstu atløgu verður dentur lagdur á at útbúgva granskarar til hetta virksemi.

STÝRISSKIPAN

Fróðskaparsetrið hevur higartil verið stýrt av setursráði við tveimum føstum limum og trimum valdum av Føroya Fróðskaparfelag.

Í samband við broytingar og viðkanir í lestrarskipanini, soleiðis sum skotið er upp í hesum áliti, heldur nevndin, at eisini stýrisskipanin eigur at verða broytt, og nevndin er sannførd um, at tann nýggja skipanin eigur at fylgja sonnu meginreglum, sum øll onnur universitet í grannalondum okkara fylgja. Hetta er serliga galdandi fyri regluna um sjálvstýri hjá universitetum. Eyðvitað verða játtanir til setrið ásettar av løgtinginum, og loyvi skal fáast til at seta nýggj størv. Nevndin heldur eisini, at avgerð um at stovna ella taka av nýggjar lestrargreinir eigur landsstýrið at taka eftir tilmæli frá setrinum; men í øllum øðrum viðurskiftum eigur **setrið at vera stjálvstýrandi.** Hetta er serliga galdandi fyri frøðiliga innihaldið í teimum ymsu námunum, við starvseting, og hvussu undirvísingin verður skipað og framd.

Til at umsita hetta sjálvstýri verður skotið upp stýrisskipan (ritmynd 5) við **setursráði** sum hægsta myndugleika, **rektara,** ið hevur ábyrgd fyri dagligu leiðsluni, og sum umboðar setrið úteftir, og hartil **trimum megindeildarráðum** (fyri ávikavist hugvísindi, samfelagsvísindi og náttúruvísindi/tøkni).

Fylgiskjal 10 er uppskot til lóg fyri Fróðskaparsetur Føroya, sum nærri ásetur samanseting, ábyrgdarøki og virki hjá hesum umboðsráðum. Harav sæst, at **megindelldirnar gera av frøðiliga innihaldið í útbúgvingunum og hava yvirábyrgd av undirvísingini. Setursráðið tekur avgerð í fíggjarmálum, málum viðvíkjandi setrinum sum heild, og setir vísindalig størv eftir tilmæli frá avvarðandi megindeild.**

Rektari, ið samstundis er setursráðsformaður, eigur at hava víðar heimildir, og **miðfyrisiting setursins er í hansara høndum.**

Bert fólk, ið eru fast knýtt at setrinum, eiga at velja setursráð og megindeildarráð, t.e. **vísindalig starvsfólk, tøkniligt starvsfólk og starvsfólk í fyrisitingina, lesandi og uttanseturs professarar og lektarar.** Tá lutfalsliga stórur partur av undirvísingini verður røktur av uttanseturslærarum, ið hvussu er í fyrstuni, heldur nevndin tað vera rætt, at teir hava ávirkan á avgerðir setursins; men av hentleikagrundum eiga teir **ikki** at kunna verða valdir til **formann, hvørki megindeildir- ella setursráðsformann.**

Við reglugerð verður setrið **skipað í deildir** ella stovnar, so hvørt sum tørvur er á. Í hesum sambandi eigur at verða tryggjað, at **allir lærarar,** eisini uttanseturs,

verða eftirspurdir, tá lð týðandi broytingar verða gjørdar í námum, ella nám verða stovnað av nýggjum og nýggj vísindastørv verða skipað.

Skilagóð menning av gransking og hægri útbúgving er treytað av sambandi og orðaskifti millum setur og landsmyndugleikar. Tí verður skotið upp at seta samstarvsnevnd, ið nærri verður lýst í fylgiskjali 10 (sí eisini ritmynd 5).


Harumframt eigur møguleiki at vera fyri at stovna **takførisnevnd millum setrið og stovnar og felagsskapir uttan fyri setrið.**

Álit um Fróðskaparsetur Føroya

Uppskot

til

Útbúgvingarskipan



Ritmynd 1

Á L Y T um

FRØÐSKAPARSETUR FØROYA

cand. phil.

í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum

Serritgerð	Bókmentir	Mál	8. hálva
Bókmentir	Mál		7. –
Bókmentir	Mál		6. –
Bókmentir	Mál		5. –

Mynd 2a

exam. art.

í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum

Serritgerð	Bókmentir	Mál	4. hálva
Bókmentir	Mál		3. –
Bókmentir	Mál		2. –
Bókmentir	Mál		1. –

Mynd 2c

---


exam. art.

í søgu og samfelagsvísindaligum greinum

Evnisøki B	Yrkisfakmentir	Samfelagsvísindaligt evnisøki	4. hálva
		Handbókar- og bókmentasøguligt evnisøki	3. –
Evnisøki A		Søguligt og samanberandi granskingarligt evnisøki	2. –
		Ásetingar- og skjalagransking	
		Mugvísindaligt evnisøki	1. –

Mynd 2b

Kitmynd 2




Mynd 3a

Mynd 3b

B.S.


Í lívirøði




Ritmynd 3

A L I T um

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA




RAVMAGNS-VERKFRØÐI



B.S.


í alisfræði/
jarðalisfræði



Mynd 4c

B.S.


í hagfræði/
teldufræði



Mynd 4d

Ritmynd 5: STYRISSKIPAN sambært

UPPSKOTI TIL LOG FYRI FRØÐSKAPARSETUR FØROYA



Álit um
Fróðskaparsetur Føroya

Yvirlit yvir fylgiskjøl

1. Jóan Pauli Joensen: Um ikki at flyta annan fótin fyrr enn hin stendur tryggur. Ein stutt søgulig lýsing av Føroya Fróðskaparfelag og Fróðskaparsetri Føroya (serprent úr Fróðskaparritum 31. bók, 1983). 27 bls.

2. Um skipan Fróðskaparseturs Føroya (upprit frá Føroyamálsdeildini 1.6.85). 6. bls.

3. Námsætlan fyri »Høvuðsgrein í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum« (uppskot frá Føroyamálsdeildini 28. oktober 1984). 4 bls.

4. Grundútbúgving í søgu og siðsøgu (uppskot frá januar 1986 í framhaldi av nevndaráliti 17. juni 1985 í samband við uppskot til søgu og siðsøgudeild við Fróðskaparsetur Føroya). 3 bls.

5. Grundskeið í heimspeki og føroyskari mentan (uppskot 20. mars 1986 í frá H.D. Joensen, Jóannes Rasmussen og Jóhan Djurhuus). 3 bls.

6. Principforslag til ombygning af et samfundsvidenskabeligt undervisning- og forskningsområde ved »Det færøske Akademi« (Sven Caspersen, Aalborg, 19. november 1985). — Køreplan for igangsættelse af samfundsvidenskabelige basisuddannelse....
(Aalborg, 10. marts 1986). 16 bls.

7. Útbúgvingar í verkfrøði. — Ein viðmerking í samband við nevndararbeiði viðvíkjandi verkfrøðiútbúgving í Føroyum (Magnus Danielsen, mai 1985). 5 bls.

8. Skeiðsheiti, skeiðssamansetingar v.m. í sambandi við S-A námskubban (støddfrøði-alisfrøði) og verkfrøðingaútbúgvingina. 3 bls.

9. Limir í undirnevndum. — Onnur, ið hava verið nevndini til handar. 1 bls.

10. Stýrisskipan: Uppskot til lóg um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis) 6 bls.

— o — O — o —

Álit um
Fróðskaparsetur Føroya

Fylgiskjal 1
27. bls.

Um ikki at flyta annan fótin fyrr enn hin stendur tryggur

Ein stutt søgulig lýsing av Føroya Fróðskaparfelag og Fróðskaparsetri Føroya

Jóan Pauli Joensen

Hetta yvirlit byggir fyrst og fremst á upplýsingar úr gerðabók Foroya Fróðskaparfelags, gerðabók seturráðsins og á skjøl, sum eru at finna í varðveitslu hjá Fróðskaparfelagnum og á Fróðskaparsetrinum. Harumframt havi eg eisini fingið munnligar upplýsingar frá Maud Heinesen, setursskrivara, ið hevur verið skrivari Fróðskaparfelagsins síðani 1963 og skrivari setursins síðani 1965, og frá Jóannesi Rasmussen, statsgeologi, ið var ein teirra, ið stovnaði Fróðskaparfelagið, og sum var nevndarlimur í Fróðskaparfelagnum og formaður í seturráðnum oll tey fyrstu árini. Tey hava eisini lisið handritið og eru komin við fleiri uppískoytum og hava rættað meg, har eg eri farin skeivur. Teimum báðum takki eg hjartaliga fyri beinasemi —

Fróðskaparrit 31. bók (1983): 11-35

Sum inngang til hetta yvirlit fari eg at loyva mær at seta hetta brot burtur úr røðu, sum formaðurin í Føroya Fróðskaparfelag Hanus Debes Joensen hevði á 20 ára stovningardegi felagsins 17. desember 1972:

»Skulu vit aftan á 20 ára royndir loyva okkum at benda á ta atferð, sum hevur rókst hollast, má vera at royna ongantíð at seta sær setningar, sum tú sjálvur ivast í at vera førur fyri at halda, ongantíð at biðja um almennan stuðul, uttan so tú sjálvur longu ert komin fitt á leið, ongantíð at sleppa persónligum ella politiskum hugsjónum og áhugamálum fram um meginmálið, ein føroyskan kordómsstovn og — einamest kanska — at arbeiða í semju og samlyndi, ið hvussu er so, at vit altíð standa saman fyri øðrum.

Royndi hevur verið, eins og til bjarga, ongantíð at flutt annan fótin fyrr enn hin fóturin stóð tryggur, og annars altíð heilt og fult at líta á hinar, sum við vóru í ferðini. Tí eitt heldur stutt komið samfelag sum okkara, sum enn ikki er komið í fasta legu sum tjóð, og har sjónarmið og áskoðanir stríðast og oftа eru heilt ósambærilig, er í mongum førum lítið mætari at lóta sær í enn í bjarglendi.«

Bátahøllin, har tað byrjaði

Hjúnini Petra og Hans Andrias Djurhuus sýndu vísindum og granskingarar-

beiði yvirhøvur sera stóran ans. Haus Andrias var formaður í Føroya Forngripafelag í mong ár og Petra var ein sera virkin savnari. Í 1951 seldu tey Sloans hús í Havn, sum tey áttu, og lótu søluupeningin til bygging av einum nýggjum savni. Umframt keypsvirði læt Tórshavnar býráð eina stóra peningagávu til sama endamál. Fyri umleið 75.000 kr. vórðu so eini hús liðugt at seta upp keypt úr Noregi. Føroya landsstýri kostaði uppsetingina av húsunum í 1952. Fyrsta framsýning í hesum nýggju hølunum var landsframsýningin, sum varð fyriskipað í 1952 í sambond við 100 ára dagin fyri, at Føroya løgting var endurreist. Í sýðra enda á hesum húsum, Bátahøllin ella Neystið, sum tey vanliga eru nevnd, varð frá byrjan, eftir ynski teirra Hans Andriasar og Petru Djurhuus, innrættað høli til fornfrøði og jarðfrøði. Hans Andrias andaðist, áðrenn húsini vórðu reist. Petra Djurhuus læt tá innrætta á loftinum í sýðra endan Hans Andriasar stovu til minnis um mann sín. Stovuna læt hon Føroya Fróðskaparfelag til felags- og arbeiðsrúm. Felagið varð formliga stovnað 17. desember 1952. Seinni fekk felagið eisini bøkur og annað, sum Hans Andrias Djurhuus hevði átt. Bátaframsýningin og náttúrusøguliga framsýningin komu ikki beinan vegin, men vórðu uppsettar so við og við. Hetta varð fyri stóran part fyriskipað av Petru Djurhuus í samstarvi við Sverra Dahl, antikvar, og Jóhannes Rasmussen, fyristøðumann fyri Náttúrugripasavninum.

Í Bátahøllini komu so Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið at halda til í nedra; Fróðskaparfelagið og seinni eisini Málstovnur Føroya Fróðskaparfelags fingu innivist á loftinum. Fróðskaparsetur Føroya helt eisini til á hesum sama lofti frá 1965 til nýggju setursbúsini vórðu bygd í 1967. Tað er sostatt fyri stóran part Petru og Hans Andriasi Djurhuus fyri at takka, at Føroya Fróðskaparfelag frá byrjan fekk arbeiðshøli og góðar umstøður at virka í.

Føroya Fróðskaparfelag varð stovnað

Fyrireikingarnar til stovnan av Fróðskaparfelagnum vórðu gjørdar í góðari tíð innan stovningardagin. Teir sum løgdu mest á seg í hesum sambandi vóru Hans Debes Joensen og Jóannes Rasmussen. Teir høvdu t.d. longu frammanundan fingið greitt fyrsta Fróðskaparrit til prentingar.

Stovnandi aðalfundurin var 17. desember 1952 á Jarðfrøðisavninum í Bátahøllini. Teir, sum vóru á hesum fundi, vóru: *Rasmus Rasmussen, fyrrv. háskilastjóri, R. K. Rasmussen, kommunulækni, dr. med., Hans Debes Joensen, landslækni, Axel Poulsen, kommunulækni, Karsten Haydal, fiskivinnufrøðingur, Hans Jacob Jacobsen, landbúnaðarráðgevari, Jóannes Rasmussen, mag.scient. og Sverri Dahl, antikvarur.*

Teir báðir Niels á Botni, fuglakonservator, Nólsoy, og Christian Matras, professari, Keypmannahavn, vóru ikki á fundi, men gjørdust limir. Hetta vóru somu menn, sum skrivaðu í fyrstu bók av Fróðskaparritum.

Á fundinum varð lógaruppskot fyri felagið sett fram og samtykt. Eisini varð samtykt at árbók felagsins »skuldi eita Fróðskaparrit við latínska heitinum: Annales Societatis Scientiarum Færoensis«.

Bæði felagið og ritið høvdu fingið navn eftir uppskoti frá Christian Matras

Mið Fróðskaparfelagsins er sbrt. § 2:

1. At taka upp samstarv við tey fólk her á landi, sum áhuga hava fyri vísindaligum starvi.
2. Á føroyskum máli at geva út Fróðskaparrit, ið er felagsárbók.
3. At fáa til vega vísindaligar bókmentir og virka fyri at fáa sottan á stovn ein ognargrunn og soleiðis royna at leggja støði undir ein komandi lærdómsstovn í Føroyum.

Nevndarlimir og onnur fólk felagsins

Áðrenn farið verður undir at greiða frá virksemi felagsins, skulu fólk felagsins verða umrødd. Á stovnandi aðalfundinum vóru tey triggir Hanus Debes Joensen, Jóannes Rasmussen og Sverri Dahl valdir í felagsnevndina, sum skipaði seg við Hanusi Debes Joensen sum formanni, Jóannesi Rasmussen sum næstformanni og Sverra Dahl sum kassameistara. Henda nevnd varð ferð eftir ferð aftur vald í 25 ár. **Kortini so at Hanus Debes Joensen og Jóannes Rasmussen skiftu um sess í 1974,** soleiðis at Jóannes Rasmussen varð formaður og Hanus Åbes Joensen varð næstformaður. Á aðalfundi 17. desember 1977 ynsktu allir triggir at fara úr nevndini, og eftir teirra uppskoti vórðu Høgni Debes Joensen, lækni, Jóan Pauli Joensen, savn vørður og Jóhan Hendriks W. Poulsen, deildarstjóri, valdir í nevndina, sum skipaði seg við Høgna sum formanni, Jóan Paula sum næstformanni og Jóhan Hendriki sum kassameistara. Henda nevnd situr enn.

Tveir tiltaksmenn og tveir roknskapargrannskoðarar hava verið valdir á hvørjum aðalfundi. Sum tiltaksmenn hava sitið: Kursten Hoydal 1952 1977, Axel Poulsen 1952-1964, Jákup Sverri Joensen 1964-1977, Bogi Hansen og Mortan Nolsøe síðan 1977. Roknskapargrannskoðarnir hava verið: R. K. Rasmussen 1952-1961, J. D. Magnussen 1952-1964 N. P. Holm 1961-1966, Hans Jacob Jacobsen 1964-1979, Jákup í Jákupsstovu 1966-1976, Jóan Pauli Joensen 1976-1977. Arne Thorsteinsson hevur verið grannskoðari síðani 1977, og John Davidsen síðani 1979.

Maud Heinesen byrjaði í 1963 sum hjálparfólk hjá felagnum og kom so við og við at virka sum skrivari felagsins. Kassameistarin førdi limaroknskapin til 1973; tá tók setursstovan við.

Roknskaparhald felagsins hevur Esbern Zachariassen annars havt um hendur: fyri bókaútgávustarvið og Málstovnin 1961-78 (hereftir setursskrivstovan), Orðabókagrunnin 1963-84, R. K. Rasmussens grunn 1966-83. Onnur fólk, sum hava arbeitt fyri felagið, verða umrødd í tí høpi, samstarvið hoyrir heima.

Fróðskaparrit

Í umsókn til Mentunargrunn Føroya Løgtings dagfestari 15. mai 1952 verður

sagt, at menn við heiðursritinum til Rasmus Rasmussen á 80 ára degi hansara í 1951 gjørdu eina fyrstu roynd til eitt føroyskt fróðskaparrit. Fært verður fram, at tað er av stórum týdningi, »at menn, sum starvast á vísindaligum økjum, sleppa leggja frá sær úrslit í føroyskari ritgerð, sum í útheiminum kann umboða Føroyar at vísindarliga og mentunarliga«. Áðrenn umsóknin varð send Mentunargrunninum, høvdu fyritreikararnir fingið teknað eitt stórt tal av haldarum á bygd. Mentunargrunnurin tók upp á seg at geva ritið út fyri eitt ár í senn, treytað av at grunnurin stóð sum útgevari og Fróðskaparfelagið sum fyritreikari av ritinum. Soleiðis kom tað fyrsta ritið út longu til stovnandi aðalfund felagsins. Í reglugerðini fyri Fróðakaparrit stendur m.a.:

»Ætlingin við hesum ritgerðum er at siga frá nýloftaðum fyribrigdum og leggja fram rannsóknarúrslit frá øllum vísindagreinum. Evnini nýtast júst ikki at vera føroysk — greinirnar skulu tó vera á føroyskum máli við útlendskum resumè, men ritgerðin má vera ein sjálvgjørd handfaring av einumhvørjum evni. Av tí at ráðini eru ring, og plássið tí verður smáhýtt — vit vilja sum nevnt geva øllum vísindagreinum innivist — verður ikki gjørligt at prenta upp skjalatilfar óviðgjørt, men ógvuliga væl greinir, sum byggja á tílíkt tilfar«.

Spurningurin, um greinir á fremmandum málum skuldu kunna prentast í ritinum, var fyrí á aðalfundi 17. desember 1966. Samtykt varð tá at gera undantak frá 2. grein 2. petti, har tað stendur, at grein skal skrivast á føroyskum, soleiðis at:

»**Kortini er ritstjórnini loyvt at gera undantak, um áneyðir eru til tess, og tá allir limirnir** eru samdir um tað. Úrtak skal tó í slíkum føri vera á føroyskum máli«.

Henda samtykt var ein dagføring av eini siðvenju, sum hevði verið galdandi síðani 1963 við 12. bók, tá Jóannes Rasmussen saman við Eske Koch skrivaði eina grein, sum varð prentað bæði á føroyskum og enskum. Síðan tá hava næstan í hvørjum riti verið onkrar greinir á útlendskum málum. Onkur hevur hildið á aðalfundum felagsins, at ov nógv er av fremmandum máli í ritinum. Spurningurin er, um ritið skal vera eitt amboð til málmenning ella eitt amboð, sum kann umboða føroysk vísindi úteftir. Í hesum sambandi skal verða vist til viðtal við Hanus Debes Joensen í Skerini, blað setursins, 1983:4. Hann sigur her, at hann iðrar seg um, at hansara doktararitgerð um bróstamjólkina røkk so stutt, tá hon varð skrivað á donskum. Spurdur um, hví tey so góvu Fróðskaparrit út á føroyskum, svarar hann, at »setningurin var heilt annar. Fremst av øllum at búgva út føroyskt vísindaligt mál.« Tey seinastu árini hevur verið roynt at gera bæði.

Mentunargrunnur Føroya Løgtings hevur givið ritið út øll árini, tey fyrstu árini kortini eftir umsókn hvørja ferð, men síðan 1955 fyri eitt longri áramál í senn. Tað var viðhvørt, at summir limir í Mentunargrunninum hildu, at ritið var ov tyngjandi fyri grunnin, men tá landsstýrið í 1960 vildi játta grunninum tað eyka, sum Fróðkaparrit gav grunninum í peningaligum halli, var hesin spurningurin loystur, og Mentunargrunnurin hevur øll árini givið ritið út, soleiðis at grunnurin hevur borið útreiðslurnar, men eisini fingið tað, sum kom inn í sølu

fyri ritið. Eitt rit sum Fróðskaparrit gevur vanliga ikki avlop, men **upp í inntøkurnar eigur eisini at verða roknað tað stóra virði av bókum** og tíðarritum, sum eru komin til landið í býti fyri Fróðskaparrit; longu í 1955 var talan um 4-5000 tíðarrit og bøkur.

Teir báðir, Hanus Debes Joensen og Jóannes Rasmussen, hava, sum tað sæst í brævskiftinum millum Mentunargrunnin og felagið, ligið sum knívur á hørðum horni fyri at tryggja fíggingina av Fróðskaparritum. Uttan tað yvirhøvur stak góða samstarvið við mentunargrunnin hevði hetta ikki eydnast.

Hanus Debes Joensen og Jóannes Rasmussen vóru einsamallir ritstjórar til 1962, tá Jóhannes av Skarði kom upp í ritstjórnina. Hann fór frá í 1973, og í hansara stað kom Jóhan Hendrik W. Poulsen. Síðan 1977 hevur hann saman við Høgna Debes Joensen og Jóan Paula Joensen verið í ritstjórnini.

Fróðskaparrit: Supplementa

Á aðalfundi 17.12.1954 boðaði nevndin frá, at hon av sínum eintingum hevði »tikið upp á seg at fyrireika umframt Fróðskparrit eina røð av størri ritgerðum í bókasniði, sum er ætlað at koma, ikki regluliga á hvørjum ári, men so hvørt sum menn hava úrslit í nóg stórari ritgerð at lata felagnum. Henda nýggja røð hevur fingið navnið SUPPLEMENTA (við framhaldandi nr.), og peningaliga støði undir hvørjum supplementum ætlar nevndin um gjørligt at hjálpa høvundunum við á tann hátt, at felagið gevur viðmæli ella beinleiðis veðdir sær við umsókn um peningastuðul til ymsar grunnar í ríkinum, sum stýðja vísindalig endamál og útgávur. Hesar ritgerðir kunnu vera á útlendskum máli, men eiga at hava føroyskt úrtak.«

Fyrsta bók í hesi røð var doktarritgerðin hjá H.D. Joensen, sum kom út í 1954. Tilsamans hevur felagið skipað fyri útgávu av 8 bókum í røðini Supplementa, av teimum eru 4 doktararitgerðir.

Onnur rit

Umframt Fróðskaparrit og røðina Supplementa hevur felagið staðið fyri útgávuni av bókum, sum eru útgivnar stakar. Hvørjar tær eru, sæst á evnisyvirlitinum yvir rit Fróðskaparfelagsins. Her skulu orðabøkurnar bert verða nevndar 2. útgáva av M. A. Jacobsen og Chr. Matras: Føroysk-donsk orðabók kom út í 1961, Jóannes av Skarði gav orðabókina út á føroyskum og donskum, orðabókinbókin, sum Jóhan Hendrik W. Poulsen stóð fyri, kom út í 1974. Tær fyrstu nevndu orðabøkurnar vóru endurprentaðar í 1977, og tá varð prentað eitt fskoyti upp í ta donsku-føroysku orðabókina. Umframt orðabøkur hevur felagið eisini givið út tvær bøkur við orðatilfari, onnur við orðum úr fyrisitingar- og skrivstovumáli og hin við orðatilfari úr alisfrøði. Ein ensk-føroysk orðabók, sum Jóhannes av Skarði stendur fyri, er farin til prentingar.

Avgreiðsla av ritum felagsins

Til 1958 hevði Føroya Gjaldstova avgreiðsluna av Fróðskaparritum um hendur

fyri Mentunargrunnin, men 15. februar 1958 varð gjørd tann avtala millum felagið og grunnin, at avgreiðslan av ritunum skuldi latast D. J. Magnussen, apotekara á Tjaldurs Apoteki, við tí starvsfólki, sum hann hevði. Tað kom serliga at vera Jákup Haraldsen, sum tók sær av avgreiðsluni. Jákup Haraldsen hevði eisini **avgreiðsluna av Supplementa um hendur, og hann** útvegaði ritinum fleiri haldarar og keyparar til Supplementa. Í 1977 tók felagið sjálvt avgreiðsluna av Fróðskaparritum og Supplementa.

Í 1971 gjørdi felagið sáttmála við E. J. Thomsen, heilsølumann, um umboðssølu av øllum bókum felagsins uttan Føroysku-donsku orðabókina, sum aðrir høvdu í umboðssølu frammanundan. Sáttmálin við E. J. Thomsen varð uppsagdur 1.12.1981. Síðan tá hevur avgreiðslan av flestum bókum, felagið hevur givið út, verið á setursskrivstovuni.

Í hesum sambandi er vert at novna, at frá teirri tíðini, Fróðskaparsetrið varð til sum stovnur, er samtykt um, at felagið skal vera forlag setursins.

Bókabýti

Sama ár sum 1. bók av Fróðskaparritum kom út, varð farið undir at fáa bókabýti i lag við stovnar í øðrum londum fyri Fróðskaparrit, seinni eisini Supplementa. Longu í 1955 hevði felagið útvegað 4-5000 bøkur í býti fyri ritið. Hesar bøkur stóðu tað fyrstu tíðina í Hans Andriasar stovu og partvist á Landssjúkrahúsinum; hetta váru mest læknabøkur.

Síðan tá eru bøkur og tíðarrit ulsamt komin á hvørjum ári. Læknabøkurnar eru enn á Landssjúkrahúsinum. Hinar bøkurnar stóðu eina tíð í nýggju setursbúsunum, men eru nú á vísindadeildini á Landsbókasavninum. Ta fyrstu tíðina váru tað teir báðir Sverri Fon, landsbókavørður, og Niels Pauli Holm, eygna- og oyrnalækni, sum serliga tóku sær av bókabýtinum. Niels Pauli Holm stóð fyri læknabókunum, og Sverri Fon fyri hinum. Í 1958 tók Arnbjørn Mortensen, studentaskúlalæri, upp á seg partin hjá Sverra Fon. At menn veruliga hava arbeitt sæst m.a. av, at Niels Pauli Holm á aðalfundi í 1959 gremur seg um, at tað ikki var nóg mikið til av líni, klistripappíri, stempulliti o.ø. til bókabýtið, og á aðalfundi í 1961 krevur Arnbjørn Mortensen fleiri bókahillar til býtisbøkurnar, sum komnar vóru. Tá Maud Heinesen byrjaði at arbeiða fyri felagið í 1963, kom hon at átaka sær ein part av tí praktiska í sambandi við bókabýtið. Í 1966 varð Ulf Zachariassen settur sum vísindaligur bókavørður í Landsbókasavninum og hevur síðan tá havt bókabýtið um hendur.

Málstovnur Føroya Fróðskaparfelags

Fróðskaparrit vórðu bert prentað á føroyskum øllum tey fyrstu árini. Hetta hevði við sær, at fleiri greinir máttu umsetast og aðrar mátti málsliga høtast um, for oysk orð vóru heldur ikki fyri øllum fyribrigdum og hugtøkum. Hetta hevði við sær nógv málsligt arbeiði og eisini beinleiðis orðasmið. Í 1955 boðaði nevndin frá, at teir vóru farnir at seta upp eitt orðasavn við orðum, sum komu fyri í Fróð

skaparritum. Árið eftir varð skotið upp, at teir, sum skrivaðu fritið, sjálvir gjørdu ein lista yvir nýyrði í grein síni at lata hesum nýggja orðasavninum. Hetta orðasavni var byrjanin til málstovn felagsins. Á aðalfundinum 17.12.1958 segði formaðurin H. D. Joensen:

»Hesi árini, felagið hevur starvast, er tað vorðið okkum meira og meira skiligt, at tað spjadda og heldur miðleysa starv, sum fer fram í føroyskari málrøkt, ov seint og allarhelst ongantíð fer at føra á mál. Vansarnir og trupulleikarnir eru so stórir og forða so nógv øllum munandi skrivligum tiltøkum her á landi, at tað eftir nevndarinnnar tykki má haldast at vera hin mest umráðandi tátturin í føroyskum mentunarstarvi í dag at fáa samskipað alt, sum vit eiga, av føroyskum máltilfari í *einum* savni, sum so við og við verður givið út sum málslig hjálparamboð. — Av tí at menn her á landi altíð hava verið og enn eru sera ósamdir um føroyskt mál, bæði skriftmál og málnýtslu, var tað okkum greitt, at fram mátti ikki farast eftir fummum, men berast mátti so í bandi, at hesin samskipandi stovnur kom at standa óheftur bæði av skiftandi politiskum floksmeirilutum og av skiftandi oddamonnum í ymiskum yrkisfeløgum og øðrum samtøkum.«

Felagsnevndin hevði gjørt eitt munagott fyrireikingararbeiði og segg seg í samband við menn, sum »í lívsyrki sínum hava roynst dyggir í livandi føroyskari málnýtslu«, og sum vildu stýðja eitt slíkt tiltak. Felagið helt fund um spurningin 27. apríl 1958, uppskot varð sett fram um stovningarsamtykt, og »Málstovnur Føroya Fróðskaparfelags« varð settur á stovn sama dag. Endamálið hjá hesum nýggja stovni var at savna føroyskt orðatilfar og skipa tað í eitt orðaseðlasavn. Stovnurin skuldi stýrast av nevnd Fróðskaparfelagsins, sum skuldi velja ein fyristøðumann, ið skuldi vera vitskapliga útbúgvin í málinum. Nevndin setti Chr. Matras, sum tá var professari við Københavns Universitet, til fyristøðumann, og Jóhannes av Skarði til dagligan leiðara. Eitt tað fyrsta sum gjørt varð, var at senda áheitan vil virki og einstaklingar um at stýðja Málstovnin peningaliga við árligum gávum. Umframt felagsnevndina skrivaði fleiri góðir menn undir áheitanina. Áheitanin gav gott úrslit, og øll árini hava gevararnir verið figgjarliga álitið há Málstovninum.

Tað lítla orðasavn, sum menn høvdu gjørt burtur úr Fróðskaparritunum, var soleiðis fyrsta savn, sum Málstovnurin kom at fáa. Sama ár varð eisini farið undir eitt stór tiltak, nevniliga at fáa ljóstikið orðaseðlarnar í seðlasavninum á Færøsk laboratorium, Københavns Universitet. Hetta arbeiði var mett at kosta 30.000 krónur í 1958. Stovnurin fekk ljóstikið ein fjórðing av hesum seðlum longu í 1958. Felagsnevndin tók ein kassakreditt, sum nevndarlimirnir persónliga heftu fyri. Ljóstøkan fór fram á tann hátt, at seðlarnir vórðu lagdir, so teir hóskaðu á eitt A4 ark, og so nógv sum arkið kundi takað. Og so varð tað klipt sundur aftaná. Hetta gjørdi, at ljóstøkini av teimum einstaku seðlunum komu at vera smærri enn teir upprunaligu seðlarnir. Hetta varð neyðugt fyri at fáa savnið heim so ódýrt sum gjørligt.

Tað tók 4 ár at fáa alt seðlasavnið heim til Føroya, og tá av tornaði kostuði

ljóstøkan kr. 46.615,50. Peningurin varð fingin til vega á tann hátt, at Dansk-Færøsk-Kulturfond læt kr. 22.500 til ordamálið, danska undirvísingarmálaráðið somu upphædd. Alt varð ikki játtað straks, men so við og við. Partarin hjá Føroya Landsstýri í hesum máli var, at landsstýrið játtaði kr. 15.000 til innrættan av hølum til Málstovnin á loftinum á Bátahøllini í 1958, tá stovnurin byrjaði virksemi sítt. Í 1963 var ein uppaftur størri partur av loftinum innrættaður til arbeiðis- og undirvísingarhøli. Her hevði Málstovnurin árskeið fyri lærarar, og her helt Fróðskaparsetrið til tey fyrstu árini.

Við hesum seðlasavninum og ti, sum kom aftrat við orðtøku úr bókmentum, innsavning úr talumáli og orðasmiði, var orðasavnið hjá Málstovninum største føroyska orðasavn, sum til var, og hetta savn øktist ár undan ári. Nógv fólk hava arbeitt sum hjálparfólk á Málstovninum, bæði við at skipa orðasavnið og við at skriva út orð úr bókmentum og gjørt arbeiði í sambandi við orðabókaútgávu. Í hesum sambandi eiga náttúrufrøðiligu orðalistarnir, sum Svenning Tausen, lærari, stóð fyri, eisini at verða nevndir.

Tá Chr. Matras í 1965 varð settur í starv sum professari við Fróðskaparsetur Føroya, varð skift um, soleiðis at frumskrivaðu seðlarnir komu á Føroyamálsdeildina og ljóstøkini vórðu send Færøsk Laboratorium.

Málstovnurin fer undir hægri undirvísing

Heystið 1962 og várið 1963 varð á Náttúrugripasavninum hildið árskeið fyri lærarar í náttúrusøguligum lærugreinum. Í januar 1963 vendi nevnd Føroya Fróðskaparfelags sær til landsstýrið við eini umsókn um játtan av 20.000 kr. um árið, fyribils í 2 ár, til at fíggja fyrireiking av einum »lærdómsstovni«. Umsóknin varð játtað, og nevndin fekk tilsøgn frá Chr. Matras professara um, at hann vildi koma til Føroya at skipa fyri einum skeiði í føroyskum máli og bókmentum. Skeiðið byrjaði í januar 1964. 6 lærarar luttóku á hesum frá skeiði umframt tvey onnur. Formaðurin í Fróðskaparfelagnum greiddi soleiðis hesum skeiði á aðalfundi felagsins 17. des. 1964.

»Skeið í føroyskum máli og bókmentum hevur verið hildið á Málstovninum frá 7. jan. til út í mai og aftur frá okt. til 10. des. 1964. Skeiðið byrjaði við lítlari hátíð 7. jan. kl. 4, har umframt fyristøðumannin Chr. Matras, professara, og átta næmingar eisini landsstýrismaður N. Winther Poulsen og umboð fyri Fróðskaparfelagið (Sverra Dahl, Jóh. av Skarði, Jóhan Hendrik W. Poulsen og H. D. Joensen) vóru hjá. Formaðurin bjóðaði vælkomin, og annars vóðru stuttar røður hildnar av Niels W. Poulsen og Chr. Matras. Skeiðið...hevur verið 4 dagar um vikuna við 2 tímum hvønn dag. Várið vórðu fyrilestrar hildnir, mest av Chr. Matras, um føroyskt mál frá øllum tíðarskeiðum umframt bygdamál. Fingist varð við brot úr øllum, síðani føroyingar fóru at skriva.

Næmingarnir fingu allir uppgávur at granska heima og síðan leggja fyri í tímunum. — Ein meinbogi á hesum skeiði var tað, at allir næmingar høvu fullan arbeiðsdag at røkja framman undan, og tiltøk mugu verða gjørd í framtíðini at

royna at loysa henda spurning. Fastur hjálpilærari 1 tíma um vikuna í lingvistiki hevur Povl Skårup, magistari, verið alt várið, men umframt vórðu einstakir fyrilestrar hildnir av Sverra Dahl, Jóhannesi av Skarði og Páll J. Nolsøe.

Í øllum førum varð samstundis gjørt bókmentalig menda av ti tilfari, sum handfarið varð. Men um heystið snúðu — eftir ynski næminga — allir fyrilestrarnir seg um yngri føroyskar bókmentir. Aftrat teimum fyrilestrum, hann sjálvur helt, hevði Chr. Matras biðið ymisk eldri og yngri skald koma á skeiðið at greiða frá og lesa upp: Hans Jac. Jacobsen, Karsten Hoydal, Jens Pauli Heinesen og Tummas Nap. Djurhuus. Aðrir høvdu verið bidnir, men lá ikki fyri hjá teimum at koma. Tó sendi Poul F. Joensen røðu inn á stálbandi, og Liggjas í Bø skrivaði røðu. — Ulf Zachariassen, magistari, hevði móti endanmun av skeiðinum 16 fyrilestrar.

Undirvísingartilfarið var tað tilfar, sum fingið er til vegar til skeiðið við at keypa (peningajáttan frá løgtinginum, sum helt fram á núverandi fíggjarlóg), lán frá Landsbókasavninum, ljósprent av ymiskum málsligum tilfari, sum ikki annars er til skjals í nóg nógvum eintøkum og partur av bókasavni Chr. Matras, sum hann hevði heim við sær.

16. des. 1964 var veitsla á parnassinum við og fyri teimum, sum á skeið høvdu verið og kent.

Skeiðið, sum er fyrsta roynd til hægri undirvísing í føroyskum, má sigast at hava verið væl eydnað, og hugurin hjá øllum tykist at vera stórur til framhald í meiri fastari legu.«

Á tí umrøddu veitsluni vórðu sjálvandi røður hildnar og ynski sett fram um ein hægri lærustovn í Føroyum. Nevndin fór eldhugað til verka at stríðast fyri hesum máli og royna at fáa Chr. Matras at koma at vera á Málstovninum burturav. Ymskir spurningar vóru at loysa í hesum sambandi, men kortini ikki verri enn so, at felagsformaðurin kundi enda frágreiðing sína um ársskeiðið við at siga, at »vónandi er tí, at Chr. matras verður skipaður í embæti sum professari her við Málstovnin 1. juli 1965.«

Tað kom kortini einki professorát á Málstovninum, tí sum kunnugt varð fróðskaparsetur Føroya sett á stovn 20. mai 1965. Fyrsta deild setursins, seinni nevnd Føroyamálsdeildin, kom at átaka sær ta gransking og undirvísing, sum Málstovnurin hevði lagt støði undir. Spurningurin var so, um Málstovnurin skuldi leggjast niður, ella um hann skuldi fáa aðrar uppgávur.

Málsligur ráðgevingarstovnur

Tey fyrstu árini eftir at Fróðskaparsetrið varð stovnsett, varð ikki hugsað so nógv um Málstovn Føroya Fróðskaparfelag tí menn høvdu nóg mikið at gera við at stíla fyri bygging at setursbúsum og fáa gongd á virksemið á setrinum. Á aðalfundi 17. desember 1968 var Málstovnurin á skránni í Fróðskaparfelagnum. Tá varð gjørt av at broyta stovningarsamtyktina, soleiðis at virksemið hjá Málstovninum nú mest kom at verða av praktiskum slag. Stovnurin skuldi fyri-

skipa ordalistar til ymsikar yrkisgreinir og annars geva málsliga leiðbeining. Á hesum øki skuldi stovnurin eisini kunna stýðja seg við Føroyamálsdeildina, tí sbrt. kunngerð nr. 52 frá 20. juni 1968 skuldi professarin í føroyskum máli verða vísindaligur leiðari av Málstovni Føroya Fróðskaparfelags. Tað hevur ikki gjørt tað lættari at skilja ímillum málstovnarbeiði og arbeiði á Føroyamálsdeildini. Virksemið var samantvinnað.

Á aðalfundinum 17. desember 1975 segði formaður Fróðskaparfelagsins Jóannes Rasmussen:

»Nevndin hevur í farna árinum umhugsað at broyta Málstovn Føroya Fróðskaparfelags til ein ráðgevandi málstovn, sum kann vera fólki til leiðbeiningar og hjálpar í dagliga yrki teirra við at útvega ordatilfar, lesa igjøgnum málsliga ella týða smærri handrit, lógir, reglugerðir, lýsingar o.t. Nevndin er samd um, hvussu tílíkur stovnur eigur at skipast, men eftir er at vita, hvussu hann skal rekast fíggjarliga.«

Nevndin var komin so langt í fyrireikandi arbeiði sínum, at lýst varð eftir fólki í starv á Málstovninum. Málið datt tó niðurfyri fyri fyrst, men í 1979 varð nýggj reglugerð gjørd fyri Málstovnin og ráðgevandi virksemi hansara. Jóannes av Skarði varð settur til dagligan fyristøðumann uttan løn og Elin Súsanna Jacobsen varð sett sum skrivari. Í sambandi við nýggju reglugerðina varð eisini sett málnevnd, sum skuldi hava regluligar fundir, har tey ráð, sum Málstovnurin hevur givið, vórðu eftirmett; eisini skal nevndin taka støðu til meira torførar málsligar spurningar, sum ikki kunnu verða avgreiddir av skrivaranum einsamøllum. Skrivarin hevur dagliga viðtalutíð. Í dagliga virkseminum fær Málstovnurin eisini holla hjálp frá Føroyamálsdeildini. Allir málsligir fyrispurningar og øll svør, sum givin verða, verða nágreiniliga skrásett, og eru sostatt eitt áhugavert granskingartilfar.

Fróðskaparfelagið hevur valt Jeffrei Hendriksen, Hans Thomsen og Jóhan Hendrik W. Poulsen í málnevndina. Á fundunum eru eisini skrivarin og fyristøðumaður Málstovnsins.

Málstovnurin verður alsamt fíggjaður við gávum frá virkjum og privatum fólkum, eisini tekur stovnurin pening fyri størri málslig ráðgevingararbeiði eftir serligum reglum. Føroya Fróðskaparfelag arbeiðir nú fyri at fáa stovnaða almenna málnevnd á sama hátt sum í grannalondum okkara.

5. víkingafundur í Føroyum 1965

Eitt av teimum fakligu størstu tiltøkum, sum Føroya Fróðskaparfelag hevur skipað fyri, var at leggja 5. víkingafundin til rættis. Hesin fundur varð hildin í Tórshavn í døgunum 18.-28. juli 1965. Fróðskaparfelagið og Føroya Fornminnissavn vóru í felag fyriskiparar. Landsstýrið og Tórshavnar býráð stóðu eisini sum innbjóðarar, og »The Patron of the Congress« var Hákun Djurhuus, løgmaður.

Yvir 50 vísindafólk hittust í Føroyum hesar dagarnar og hildu fund um norrøn evni. Fundurin fór fram í Studentaskúlanum í Hoydølum. Frágreiðing um fund-

in og fyrilestrar hildnir á fundinum er givin út í bókini »The Fifth Viking Congress, Tórshavn, July 1965«, sum Bjarni Niclasen leggði til rættis (1968). Tað skal ikki verða gjørt meira burtur úr hesum fundi her uttan at siga frá, at hann var sera væl umtóktur, og søgur ganga enn frá honum.

Fróðskaparsetur Føroya

Fróðskaparsetrið verður sett á stovn

Føroya Fróðskaparfelag hevði miðvíst lagt lunnar undir eitt vísindaligt umhvørvi, fyrst við Fróðskaparritum og bókabýtinum, síðan við málsliga savningararbeiðinum og at enda við hægri undirvísing fyri lærarum, fyriskipaðari av Málstovninum og Náttúrugripasavninum. Í 1965 eydnaðist tað eisini at fáa ein hægri lærdomsstovn í Føroyum.

Á aðalfundinum 17. desember 1964 boðaði formaður felagsins frá, at teir nú høvdu eitt liðugt uppskot til stovnseting og lóg fyri Fróðskaparsetur Førnya (Academia Færoensis), og 18. februar 1965 kom uppskotið á tingbord. Niels Winther Poulsen, landsstýrismaður, legði uppskotið fram. Lógin var í 7 greinum. Viðmerkingarnar til uppskotið vóru drúgvar. Víst varð til tað arbeiði, sum var farið fram í felagnum og á øðrum granskingarstovnum. Tað er vert at geva gætur, at menn ikki hugsaðu sær, at Fróðskaparsetrið skuldi standa einsamalt, men at tað skuldi »fremja rannsóknararbeiði og skipa fyri hægri undirvísing í Føroyum í sambandi við søvn landsins: Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið, Fornminnissavnið, Náttúrugripasavnið og Fiskirannsóknarstovuna.«

Hetta vóru granskingarstovnarnir, ið tá vóru. Eftir uppskotinum hjá Fróðskaparfelagnum skuldi felagið sjálvt byggja hús, sum skuldi liggjast við gávum og lagaligum lánum frá peningastovnunum og møguligum peningi, sum felagið sjálvt kundi útvega. Landsstýrið skuldi bert rinda sjálvan raksturin. Fróðskaparfelagið hevði havt samráðingar við peningastovnarnar frammanundan.

Í tinginum varð málið beint í eina 5-mannanevnd, sum hevði hesar limir: Sigurð Joensen, Marius Johannesen, Poul Petersen, J.H. Dalbjørg og Johan Poulsen.

Í uppskotinum frá Fróðskaparfelagnum var mælt til, at Fróðskaparsetrið varð stýrt av einum setursráð við 5 limum. Fróðskaparfelagið skuldi velja trýggjar, og sitandi landsstýrismaðurin í mentamálum og skrivstovustjórin á Landsfyrisitingini skuldu verða føddir limir; eisini vóru reglur fyri, hvussu limir felagsins skuldu veljast. Løgtingsnevndin býtti seg í eitt meiriluta og eitt minniluta. Meirilutin helt ikki, at tað bar til, at landsstýrismaður og skrivstovustjóri landsins vóru føddir limir í setursráðnum. Eisini høvdu teir okkurt at finnast at í sambandi við val av limum felagsins í setursráðið, m.a. vildu teir tryggja sær, at bert limir búsitandi í Føroyum komu í setursráðið. Teir skutu upp, at § 3 í lógini varð broytt til:

»Fróðskaparsetrið verður stýrt av einum setursráði við 5 limum.

Landsbókavørðurin og rektarin við Føroya hægri skúla skulu vera limir í ráðnum.

Føroya Fróðskaparfelag velur 3 limir í ráðið, hvønn fyri eitt ár, tó soleiðis, at við 3. kensluársslok fer ein og við 4. kensluársslok ein av hesum frá við lutakasti. Við val av ráðslimum hava bert felagslimir búsettir í Føroyum atkvøðurætt. Til tess at verða valdur í setursráðið skal maður vera búsettur í Føroyum.

Endurval kann fara fram.

Tann landsstýrismaður, sum hevur skúlaskapin um hendur, hevur atgongu til allar fundir ráðsins; hann skal fúa og kann geva fundarboð.«

Minnilutin, Johan Poulsen, segði, at hann hevði sera stóran áhuga fyri málinum, men helt ikki at rætt var farið fram:

»Tað, sum her er talan um, er at seta á stovn 2 fakultetir ella lærustólar ávikavist í føroyskum — norrønum — máli, og í søgu, tvær sera týdningarmiklar, ja, grundleggjandi lærugreinir, tá hugsað verður um at tryggja og varðveita okkara eginleikar sum serstaka tjóð framvegis. Tað er púra skeivt, um menn í hesum føri hugsast um so: »Lat okkum bara byrja, tað, sum í vantar, kemur seinri av sær sjálvum!« Ein skeiv byrjan skapar altið trupulleikar aftaná. Tað, sum er høvuðsvanin her, er, at tað fíggjarliga grundarlagið er ov veikt. Fróðskaparsetrið verður stovnað uppá privatar gávur + ein lítlan studning frá løgtinginum.... Ein tílík úthygging av okkara lærda skúlaskapi kann ikki byggjast uppá eitt so svikaligt fíggjarligt grundarlag sum »privatar gávur«. Skal tað verða nakað hald í loysnini av hesi uppgávu, má tað almenna standa sum garantur.«

Joan Poulsen skeyt upp at taka málið um Fróðskaparsetur til gjøllari umhugsan, og royna at samskipa setrið við studentaskúlan í Høydølum og síðan leggja málið aftur fyri tingið.

Uppskotið frá meirilutanum varð samtykt, t.e. uppskotið frá Fróðskaparfelagnum við einstøkum broytingum. 6. mai 1965 samtykti eitt einmælt løgting at seta á stovn Fróðskaparsetur Føroya. Sjálvt lógin er dagfest 20. mai 1965.

Longu 24. mai 1965 var eykaaðalfundur í Fróðskaparfelagnum, sum valdi Jóannes Rasmussen, Hanus Debes Joensen og Jákup Sverra Joensen í setursráðið aftur at teimum báðum føddu limunum Arnbjørn Mortensen, rektara, og Sverra Fon, landsbókavørði. Kl. 21.00 sama kvøld hevði nývalda setursráðið sín fyrsta fund. Ráðið skipaði seg við Jóannesi Rasmussen sum formanni og Hanusi Debes Joensen sum næstformanni. Til aðalskrivara ráðsins varð Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, valdur. Í avgreiðslunevnd setursins vórðu valdir Jóannes Rasmussen, Hanus Debes Joensen og aðalskrivarin.

Fyrsta málið, sum ráðið tók avgerð um, var at seta Christian Matras í starv sum professara á Fróðskaparsetrinum frá 1. september 1965. Harnæst varð boðað frá, at ognirnar hjá Málstovninum skuldu latast Fróðskaparsetrinum, at ársskeið í føroyskum skuldi byrja 1. september sama ár, at Maud Heinesen varð sett sum skrivari seturráðsins. Eisini var bygginevnd sett at skipa fyri bygging av

nýggjum húsum til Fróðskaparsetur Føroya.

Á aðalfundinum í Fróðaksparfelagnum 17. desember sama ár sagði ein gladur formaður, at »fáur okkara mundi, tá ið saman um kemur, tá ið felagið varð stovnað 17. desember 1952, væntа, at seinustu reglur í 2. grein í felagslógini so skjótt skuldu ganga út: at leggja støði undir ein komandi lærdómsstovn í Føroyum.«

Bygging av setursbúsinum

Fróðskaparfelagið hevði í 1964 gjørt eitt skitsuuppskot til eini hús. Á fyrsta setursráðsfundi 24. mai 1965 varð sett ein nevnd at skipa fyri byggingini. Í byggineyndina vórðu setursráðslimirnir valdir, Chr. Matras, professari, og Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur.

Avgjørt varð, at Føroya Fróðskaparfelag skuldi byggja húsini og síðani handa sjálvsigandi stovninum Fróðskaparsetri Føroya tey. Í september 1965 varð samtykt at byggja eini hús í tveimum lonum oman fyri Bátahøllina. Syðra lonin skuldi byggjast í tveimum hæddum við skrivstovum, fyrilestrasali og eldtryggum goymslurúmi í miðhæddini, og 4 búrúmum, køki og baðirúmi í loftinum. Norðara lonin skuldi vera í trimum hæddum. Fiskiídnaðarstovan skuldi hava høli í kjallaranum, Fiskirannsóknarstovan miðhæddina, og loftið skuldi vera hjá Fróðskaparsetrinum at taka til. Lønhauge & Waagstein detailprojekteraðu húsini, og byggifelagið Danberg & Joensen bygdi tey. Frá sumri 1967 fluttu stovnarnir inn so við og við, og húsini vórðu alment tikin í nýtslu 17. desember 1967. Í hesum samabandi var hátíðarhald við nógvum bodnum gestum.

Eftir skitsuuppskoti Fróðskaparfelagsins í 1964 skuldu húsini kosta kr. 500.000. Tá ið liðugt var at byggja og hampa uttan um húsini, var byggikostnaðurin kr. 700.000 (búrúmini íroknað). Afturat hesum komu 25.000 kr. til at innrætta lesistovu til vísindadeildina á loftinum í norðaru lonini.

Upprunaliga hevði ætlanin verið at fáa peningastovnar í landinum í felag at reisa Fróðskaparsetrinum eini hús, men tað bar ikki til. Fíggingini kom so at vera tann, at Føroya Sparikassi lat 200.000 kr. í lagaligum láni til bygging av Føroysmálsdeildini og játtaði samstundis úr gávugrunni sínum at lata studning til afturgjaldingar av láninum. Eftir einans trimum árum var lánið á hendа hátt. afturgoldið. Tá saman um kemur, hevur Føroya Sparikassi sostatt givið Fróðskaparsetrinum syðru lonina av setursbúsunum. Norðara lonin, sum skuldi hýsa Fiskirannsóknarstovuni og Fiskiídnaðarstovuni, varð fíggjað á tann hátt, at Føroya Banki, Sjóvinnubankin og Tryggingarsambandið veittu kr. 125.000 í láni hvørt at gjalda aftur eftir 30 árum við lagaligari rentu. Lánini vórðu síðan hækkað við 30.000 kr. frá hvørjum av teimum fýra nevndu stovnunum. Rentur og avdráttir hevði setrið goldið av peningi, ið er fingin úr landskassanum, fyrst sum byggistudningur, síðani sum leiga.

Tey fýra búrúmini vórðu fíggjað so, at Føroya Lærarafelag lat pening til Skúlans stovn, Føroya Landsstýri til Bóndans stovu, Tórshavnar býráð til Áarstovu og Collegium Academicum Færoensis til Jarnsarstovu. Hvør lat 20.000 kr.

Peningurin, setrið hevði at byggja fyri, var tilsamans 775.000 kr., byggikostnaðurin 725.000 kr. Sostatt fekk setrið eitt avlop til seinni nýtslu. Tær báðar lonirnar eru tó framvegis einastu hús, sum sjálveigandi stovnurin Fróðskaparsetur Føroya eigur. Fróðskaparsetrið hevur í dag eisini innivist í hølunum, sum landið eigur, og leigar eisini frá privatum.

Virksemi Fróðskaparsetursins

«Endamál setursins er vísindaligt rannsóknarstarv og hægri undirvísing. Skyldu læraranna er at fremja bæði,« stendur í lóg setursins. Við einum professara og einum »hálvum« fólki í fyrisitingini kom hesin nýggi stovnurin sjálvandi at sigla við smáum seglu ta fyrstu tíðina. Á Føroyamálsdeildini varð undirvíst á ársskeiði fyri læraraum, og málsliga rannsóknararbeiðið, sum byrjaði á Málstovninum, helt fram á Føroyamálsdeildini undir kønu hond Christians Matras. Ársskeiðini í náttúrusøgu lógu undir Fróðskaparsetrinum, men vórðu leidd og fyriskipað av Náttúrugripasavninum. Ta fyrstu tíðina var tað vanligt, at setursráðið setti nevndir til at taka sær av uppgávum, sum ikki hoyrdu undir Føroyamálsdeildina ella annan granskingarstovn. Ein uppgáva, sum setusráðið legði sera stóran dent á tey fyrstu árini, var innsavning.

Innsavningarnevndir

Tá ið setrið hevði fingið egin hús og trygg goymsluhøli, hildu metin, at nú átti ikki at verða bíðað longur við at royna at bjarga ti, sum bjargast kundi, av føroyskari fólkamentan. Í februar 1967 setti setusráðið eina innsavningarnevnd. Í innsavningarnevnd Fróðskaparsetursins vórðu valdir: Robert Joensen, Klaksvík, Jóhannes av Skarði, Tórshavn, Sverri Dahl, Tórshavn, og Mortan Nolsøe, Oslo. Sum umsjónarmaður fyri nevndina varð settur Bjarni Niclasen, Tórshavn. Nevndin útvegaði spurnabløð, og fleiri av nevndarlimunum skrivaðu eisini sjálvir spurnabløð. Við hjálp frá Meginfelag Føroyskar Studenta kom setrið í samband við fleiri føroyskar studentar, sum vildu átaka sær at ferðast um landið og savna í summarfrítíðini. Innsavningin fór fram sumrini í 1967 og 1968 í Vágum, Eysturoy, Norðoyggjum, Sandoy og Suðuroy. Umframt frásagnir av manna munni, skrivaðar upp ella tiknar upp á ljóðband, vórðu eisini gripir og amboð savnað ella fotograferað. Gripirnir vórðu latnir Fornminnissavninum í varðveitslu, og frásagnirnar og myndirnar vórðu lagdar í savn á Føroyamálsdeildini. Í hesum sambandi eigur eisini at verða nevnt, at írski professarin, fólkaminnisfrøðingurin S'eamus O'Duilearge hevði havt stóra ávirkan á limir í setursráðnum og mælt til hetta innsavningararbeiði. Setursráðið bey honum tí eisini til Føroya at leggja fyriskiparum og savnarum lag á í savningararbeiðinum. Eisini helt hann ein almenna fyrilestur um írska fólkomentan.

Tjóðlívsnevndin varð í 1970 sett sum eitt framhald av Innsavningarnevnd Fróðskaparsetursins. Hetta var upprunaliga ein sjálvstøðug millumstovna nevnd við Chr. Matras, Sverra Dahl, Sverra Egholm, Niels Juel Arge og Robert

Joensen sum nevndarlimum. Jóan Pauli Joensen, stud.mag., varð settur til skrivara, og Hanna Absalonsen til hjálparfólk. Nevndin hevði arbeiðsrúm á Føroyamálsdeildini, og tað tilfar, sum nevndin savnaði, varð goymt á Føroyamálsdeildini. Helst hava menn hildið, at nevndin hekk í leysari luft, tí á setursráðsfundi í november 1971 varð samtykt, at nevndin skuldi leggjast undir setur og setursráð. Tjóðlívsnevndin varð eftir setursráðssamtykt 21. juni 1972 avtikin frá 1. apríl 1973 at rokna. Tjóðlívsnevndin skipaði fyri innsavning bæði innan føroyskt fólkalív og føroysk fólkaminni; nevnast kann t.d. sluppninnisinnsavningin, sum fór fram summarið 1971 og veturin 1971/72.

Menn vórðu samdir um, at innsavningararbeiði átti at fara fram á stovnunum sjálvum. Ein avtala varð gjørd millum Fornminnissavnið og Fróðskaparsetrið um, at Fornminnissavnið skuldi savna tað, sum hevði við evnisliga og samlelagsliga mentan at gera, og Føroyamálsdeildin skuldi savna fólkaminni, t.e. kvæði, sagnir o.a.

Stutt áðrenn Tjóðlívsnevndin varð avtikin, varð sett ein serlig innsavningarnevnd, sum skuldi skipa fyri innsavning av føroyskum andaligum sálmasangi og vísusangi. Henda nevnd kom at skipa fyri tí innsavningararbeiði, sum Karl Clausen, deildarleiðari við Aarhus Universitet, áður einsamallur hevði havt ábyrgdina av. Í hesa nevnd komu Chr. Matras, Ole Jacobsen, Karl Clausen og Jóhan Hendrik W. Poulsen. Sjálvt innsavningararbeiðið varð gjørt av Karl Clausen og dóttur hansara Marianne Clausen, sum tók við sum limur í nevndini eftir deyða faðirs síns í 1973. Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at Janus Mohr var teimum sera hollur í innsavningararbeiðinum. Upptøkurnar við songunum og vísunum eru goymdar á Føroyamálsdeildini, men bók er eisini givin út um hetta (Åndelig visesang på Færøerne).

Ritgerðakappingar Fróðskaparsetursins

Í 1970 fór Fróðskaparsetrið undir eitt nýtt tiltak, ritgerðakappingar, sum øll kundu luttaka í. Fyrsta ritgerðarevnið var um fiskaarbeiði í slupptíðini. Tað var lýst í skránni 1970/71. Síðani hevur verið lýst við ymiskum evnum á hvørjum ári. Til at meta um bestu úrslitini setur seturráðið eina dómsnevnd við fleiri limum fyri hvørt evni. Tey bestu handritini fáa virðisløn. Higartil hevur ritgerðakapping verið um fiskaarbeiði í slupptíðini, føroyskan klædnabúna, føroyska matgerð, luft og skýggj, føroysku kvinnuna og lívskor hennara, streymviðurskifti, barnaspøl, gomul veðurmerki, bygdaskúlan, føroyskar kirkjusiðir, Føroyar undir báðum heimsbardøgunum, torvarbeiði, endurminningar, og ritgerðarevnið fyri 1983/84 er um ungmannafeløg. Ikki bert hava hesar ritgerðakappingar styrkt sambandið millum setrið og fólk yvirhøvur, men tær hava eisini fingið til vega eitt dygdargott heimildartilfar í søvn setursins til granskarar at nýta.

Eftirútbúgving av lærarum

Sum eg longu havi nevnt, høvdu Náttúrugripasavnið og Málstovnur Føroya

Fróðskaparfelags ársskeið, áðrenn setrið varð stovnað. Hesi ársskeið hildu fram undir setrinum í mestsum sama líki. Hvørt skeið var skipað sum ein heild, og tú valdi annað teirra. Náttúrugripasavnið stóð framvegis fyri náttúruseguligu skeiðunum, men Føroyamálsdeildin skipaði fyri ársskeiðunum í føroyskum. Tá farið varð undir at undirvísa til prógv á Føroyamálsdeildini í 1974, varð undirvísingin á ársnáminum og prógvnáminum í nógvum førum løgd saman við. Hetta vóru lærararnir ikki altíð so nøgdir við. Frá 1981/82 at rokna vórðu tí ársskeiðini broytt á tann hátt, at læraraeftirútbúgvingin varð býtt sundur í fleiri smá skeið, sum skifta ár um ár. Hesi skeið kunnu so fólk seta saman eftir tørvi, ella bert taka støk skeið, um tey vilja tað. Skeiðini verða løgd til rættis av eini serligari ráðleggingarnevnd við umboðum fyri Fróðskaparsetrið, Føroya Læraraskúla, Føroya Lærarafelag og Landsskúlafyrisitingina. Henda skipan, ið verður fyrisitin av setursskrivstovuni, hevur virkað væl. Umframt fostu lærarar setursins á teimum trimum deildunum undirvísa eisini tímaløntir uttanseturslærarar á læraraskeiðunum. Setrið hevur í umbúna at skipa læraraeftirútbúgvingina sum eina serliga deild.

Undirvísing fyri almenning

»Einum og hvørjum er loyvt at lurta eftir almennum fyrilestrum setursins,« stendur í lógini um Fróðskaparsetrið. Hetta er støðið undir almenna undirvísingarvirkseminum setursins, ið fevnir um fyrilestrar og kvøldskeið.

Fyrstu tvey árini varð skipað fyri nøkrum fáum fyrilestrum í leigaðum høli. Sama ár, sum setursbúsini vórðu tikin í nýtslu, varð útgivin skrá fyri árið 1967/68 við m.a. føstum fyrilestrakvøldum fyri almenning. Árið eftir kom fyrsta kvøldskeiðið á skránna: Skeið í føroyskum.

Síðani hava almennu fyrilestrarnir — um óteljandi evni — og kvøldskeiðini, sum øktust í tali so við og við, verið fastur táttur í virksemi setursins.

Seinnu árini hevur setrið avmarkað tilboð síni um kvøldskeið til ávís evni, fyrst og fremst evni, ið kvøldskúlarnir ikki hava. Føroyskt og ættargransking eru tó varðveitt. Eisini kann verða nevnt, at enskt er umskipað, soleiðis at nú ber til at taka tey kendu Cambridge-prógvini í enskum við setrið.

Í 1975 vóru starvsstovuhúsini á Debesartrøð liðug at taka í nýtslu. Landsskjalasavnið flutti inn í niðasta hædd, nýggja Heilsufrøðiliga Starvstovan í miðhæddina. Fróðskaparsetrið fekk loftið til skrivstovu og fyrilestrarsal. Hetta bøtti munandi um umstøðurnar.

Bæði fyrilestrar og kvøldskeið hava øll árini fingið undirtøku frá fólki.

»Filosofikum«

Í mansaldrar hevur eitt lítið prógv í heimspeki, vanliga nevnt »filosofikum« verið ein treyt til at sleppa upp til fyrsta part av eini universitetsútbúgving. Hetta prógv varð vanliga tikið tað fyrsta lestrarárið. Tað var tí náttúrligt, at hetta var eitt tað fyrsta prógv, sum hugsað varð um at skipa fyri á setrinum. Formaður setursins í mong ár, Jóannes Rasmussen, hevur sagt fyri mær, at upprunaliga

var ætlanin at samansjóða »filosofikum« við undirvísing í føroyskum máli, bókmentum og mentan, so at tey lesandi kundu byggja á eitt heimligt støði, áðrenn tey fóru uttanlands at lesa.

Í 1970 varð lærarastarv í heimspeki lýst leyst at søkja. Tvær umsóknir komu. Setursráðið metti hetta sum eitt álvarsmál og setti dómsnevnd við trimum metingarmonnum á professarastigi úr Danmark, Noregi og Íslandi. Eftir tilmæli frá metingarnevndini varð Klaus H. Jacobsen mag.art settur í starvið sum deildarstjóri á Heimspekideildini frá 1. januar 1971 at rokna. Undivísing í heimspeki byrjaði sama heystið, og skipað varð eisini fyri eini 2 ára útbúgving, sum taldi sum hjágrein — exam.art — í einum cand.mag-prógvi. 6 fólk tóku »filosofikum« várið 1972, men eingin kom nakrantíð at fullgera exam.art.-prógv í heimspeki.

Tíverri hendi tað, at danska undirvísingarmálaráðið sama ár, sum »filosfikum« varð sett á undirvísingarskránna hjá setrinum, slepti treytunum um at taka filosofikum fyri at kunna lesa við donsk universitet. Flestir føroyingar fóru til Danmarkar at lesa, so hetta tók grundarlagið undan undirvísingini í heimspeki við Fróðskaparsetur Føroya. Um sama mundið hendi eisini tað í Danmark, at farið varð undir nýggjar útbúgvingarhættir við tey nýggju universitetini í Roskilde, Odense og seinni eisini Aalborg, nevniliga »basisuddannelse« — ein tvørfrøðilig grundútbúgving, ella støðisútbúgving, sum hon kom at eita á føroyskum. Í Danmark varð eisini roknað við eini náttúruvísindaligari, samfelagsligari og eina humanistiskari støðisútbúgving. Oman á hesa støðisútbúgving kundu byggjast styttri starvsvendar útbúgvingar, ella fólk kundu halda fram til fulla akademiska útbúgving, sum gav sama rætt sum útbúgvingarnar við tey gomlu universitetini. Hesin nýggji útbúgvingarháttur kom eisini at gera vart við seg á setrinum og gjørdi sítt til, at áhugin fyri heimspeki sum lærugrein fánaði burtur.

Støðisútbúgving

Deildarstjórin á Heimspekideildini Klaus H. Jacobsen hevði havt eitt ávíst samband við støðisútbúgvingina við Odense Universitet, og Kjartan Hoydal, sum var komin í starv á Fiskirannsóknarstovuni, hevði havt eitt ávíst samband við støðisútbúgvingina á Roskilde Universitetscenter. Á fundi í setursráðnum í februar 1971 greiddu teir setursráðnum frá hesi nýggju útbúgvingini, sum teir hildu hóska sera væl til føroysk viðurskifti. Setursráðið fekk áhuga fyri útbúgvingini, og í januar 1972 varð lagt fram uppskot um støðisútbúgvingina at byrja sama heystið. Upprunaliga var hugsanin tann, at støðisútbúgvingarhugsjónin skuldi koma at galda fyri alla útbúgving á setrinum, men av praktiskum og figgjarligum orsøkum varð byrjað við náttúruvísindarligari/heimspekiligari støðisútbúgving. Klaus H. Jacobsen varð settur sum deildarstjóri á Støðisútbúgvingini ella Støðisútbúgvingardeildini. Sum deildarleiðari í alisfrøði varð settur Magnus Danielsen, lic.techn., sum frammanundan hevði starv sum lektari við Danmarks Tekniske Højskole. Allir hinir lærararnir vóru tímalønir. Stutt eftir

byrjanina tóku trupulleikar seg upp í sambandi við ymisk sjónarmið um undirvísingarlagið í hesi nýggju útbúgving. Royndin varð tó førd at enda, og summarið 1974 hevði fyrsta lidið fullført hesa útbúgving og fingið nágreiniliga lýst á skjali tað, tey høvdu lært. Støðisútbúgvingin var prógleys, tey lesandi fóru ikki upp til prógtøku í vanligari merking.

Tey fyrstu tvey árini við støðisútbúgvingini vóru royndarár. Á vári 1974 varð samtykt at steðga á eitt ár, samstundis sum tikið skuldi verða til umhugsanar, hvørjar undirvísingaruppgávur setrið í framtíðini átti at taka upp á seg.

Í sama viðfangi kom áheitan frá táverandi løgmanni, Atla P. Dam, um at umhugsa spurningin um upptøku av nýggjum. Løgmaður helt seg til at útvega neyðugar játtanir. Eitt ikki samsint setursráð tók undir við áheitanini, og næmingar vórðu upptiknir í 1974 við góðkenning frá fíggjarnevndini viðvíkjandi serjáttan. Sama summarið vórðu 11 nevndir settar at kanna útbúgvingartørv og — líkindi í Føroyum.

Árið eftir vildi ein meiriluti í landsstýrinum hava setrið at taka upp nýggjar næmingar, men setursráðið helt hesa ferð fast um samtykt sína at steðga eitt ár. Mett varð, at støðisútbúgvingini tørvaði ymsar broytingar, og framhald var ikki ráðiligt, fyrr enn fullfíggjað uppskot varð handað landsstýrinum um teir partar av hægri útbúgving í Føroyum, sum setrið helt seg ført fyri at fara undir. Í tí sambandinum segði landsstýrið seg vilja tryggja sær næmingaupptøku í 1976 og heitti á setursráðið um at skunda undir og ávirka tey ymsu nevndararbeiðini til tess at fáa til vega fyribils ummæli í oktober 1975, soleiðis at viðgerð kundi byrja millum landsstýrið, setursráðið og støðisútbúgvingina. Tá svar var fingið, vildi landsstýrið »fara undir arbeiðið at fáa til vega játtanir til bøtt hølis- og onnur viðureskifti á støðisútbúgvingini.«

Sum nevnt helt støðisútbúgvingin fram í 1974. Hetta hevði við sær, at fleiri nýggir lærarar máttu setast. Magnus Danielsen, ið hevði farloyvi frá starvi sínum úr Danmark, fór aftur í sítt gamla starv, og Bogi Hansen, mag.scient. varð settur í hansara stað. - sum deildarleiðari í alisfrøði. Petur Zachariassen, cand.scient. varð settur sum deildarleiðari í støddfrøði, hag- og dátufrøði og Dorete Bloch, cand.scient. sum deildarleiðari í lívfrøði. Hesi trý vórðu sett í starv frá 1. august at rokna (deildarleiðaraheitini eru seinni broytt til lektaraheiti). Pauli Nielsen, cand.ped. sat í hálvum starvi sum pedagogiskur ráðgevi 1976/77. Hetta starv varð niðurlagt, men samstundis, 1. august 1977, varð Trygvi Vestergaard settur sum adjunktur í evnisfrøði-/lívevnafrøði. Við honum var Støðisútbúgvingin komin upp á fult læraratal. Undirvísingin hevur hildið fram við smáum broytingum og tillagingum til 1980. Hetta árið vóru alt av fáir næmingar til, at farast kundi undir undirvísing.

Støðisútbúgvingin byrjaði undirvísingina aftur heystið 1981, men útbúgvingin varð nú skipað heiltøðrvísi enn fyrr. Næmingarnir skuldu nú upp til prógtøku í teimum ymisku lærugreinunum, men samstundis kom tað, sum hevði verið aðaltáttur in í støðisútbúgvingini eftir tí gamla lagnum, nevniliga prosjektur-

beiðini, at fáa minni týdning. Hetta er alt í samstarvi við ta gongd, sum er farin fram á støðisútbúgvingunum í Danmark.

Onkur lærari er farin av Støðisútbúgvingini í annað starv. Klaus H. Jacobsen fór úr starvi sínum á Støðisútbúgvingini í 1975 aftur til sitt gamla starv sum lektari við Odense Universitet, og Bogi Hansen fór í 1982 í starv sum hydrografur á Fiskirannsóknarstovuni. Eftirmaður Boga Hansens er Hans Pauli Joensen cand.scient., sum byrjaði sína útbúgving á Støðisútbúgvingini í 1974.

Prógnám í føroyskum

Sum longu nevnt hevur verið skipað fyri ársskeiði fyri lærarum á Føroyamálsdeildini fram til 1980, tá ársskeiðini vórðu løgd umsitingarliga undir setursskrivstovuna. Til 1970 var bert eitt fast vísindaligt starv á deildini, nevniliga professarastarv Christian Matras. Jóhan Hendrik W. Poulsen, magart. kom sum leysløntur á deildina í 1968, men ikki fyrr enn í 1970 varð hann settur í fast starv sum hjálparlærari og orðabókarritstjóri. Professarastarvið varð í 1971 lýst sum deildarstjórastarv, og varð Jóhan Hendrik W. Poulsen settur í hetta starv frá 1. januar 1972. 1. januar 1973 fekk deildin eitt starv afturat, tá Mortan Nolsøe, magistari í fólkaminnisfrøði, varð settur í starv sum amanuensis á Føroyamálsdeildini. Hann hevði fyrr starvast við universitetið í Oslo. Deildin hevði nú tvey først vísindalig lærarastørv.

Í juni 1973 varð sett uppskot fram í setursráðnum um at skipa fyri akademiskum prógvi í føroyskum, sum kundi verða liður í fullari akademiskari útbúgving við universitet í øðrum landi. Í fyrsta umfari varð bert hugsað um eitt prógv, ið kravdi eitt árs lestrartíð. Hetta prógv hóskaði ikki upp í útbúgvingarlagið í Danmark, men sera væl í Íslandi, Noregi og Svøriki. Ávirkanin frá norskum universitetsútbúgvingarlagi er her púra greið. Í hesum sambandi eigur eisini at verða nevnt, at setursráðið í 1967 hevði ætlanir um at fara undir eina 3-ára útbúgving, sum umframt filosofikum eisini skuldi fevna um útbúgving í føroyskum máli, bókmentum og føroyskari mentan, kanska eisini søgu. *Færoikum* kallaðu teir hetta prógv sínámillum. Hetta hevur svarað til hjágrein ella til B.A.-prógv. Men henda ætlan varð ongantíð framd.

At fara undir prógvnámið hevði við sær, at fleiri lærarar máttu setast í starv við setrið. Eitt málfrøðistarv og eitt bókmentastarv vórðu lýst leys. Óli Jacobsen, magistari, sum var deildarleiðari við København's Universitet, varð settur í bókmentastarvið, og Trygve Skomedal, ið var lektari við universitetið í Oslo, varð settur í málfrøðistarvið. Báðir hava verið aftur, Óli Jacobsen fleiri ferðir, og á honum lá ábyrgdin av bókmentaundirvísingini í mong ár. Síðan hava ymisk fólk verið í hesum størvum í styttri ella longri tíðarskeið. Turið Joensen B.A. undirvísti 2 ár í bókmentum, bretin W. Glyn Jones, professari, hevði starvið í 2 ár, og Patricia Conroy, professari, úr U.S.A., varð sett sum lektari í eitt ár. Sviin Bjørn Hagstrøm, docentur,fildr., var gestaprofessari í málfrøðistarvið í eitt ár. Frammanundan hevði hann málfrøði eina lestrarhálvu. Seinni hevur hann vitjað sum gestalærari.

Í 1979 var Eivind Weyhe, mag.art. settur í málfrøðistarvið, og í 1983 varð Malan Simonsen cand.mag. sett. í bókmentafrøðistarvið. Umframt tey her nevndu fólk hava fleiri onnur undirvíst sum tímalærarar ella gestalærarar á Føroyamálsdeildini, t.d. hevur Ulf Zachariassen mag.art., verið fastur tímalærari í moug ár (var vikarur í bókmentastarvinum eina lestrarhálvu).

Ársnám í »norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum« byrjaði heystið 1974 og tóku tey fyrstu fólkini prógv várið 1975. Tey lesandi ynsktu at fáa høvi at lesa eitt ár afturat, soleiðis at tey kundu fáa eitt prógv, sum samsvaraði við danska hjágrein — exam.art., men lærarar og setursráð tóku ta støðu, at best varð at lata eitt lið fullgera ársnámið afturat og so byrja við exam.art.-náminum í 1976. Hetta varð gjørt. Síðani hevur annaðhvørt ár verið undirvíst í ársnámi, annaðhvørt í exam.art.-námi.

Talan hevur í nógv ár verið um at fara undir høvuðsgreinarlestur cand.phil — í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum. Ætlanin er nú at byrja høvuðslesturin á heysti 1985.

Gudfrøði

Fyrst í 1970-unum bar til at taka prógv í fornlatíni, forngrikskum og hebraiskum við Fróðskaparsetrið. Hetta vóru støk skeið, men tey kundu koma til nyttu í gudfrøðilestri. Bert eitt av hesum skeiðum varð nakrantíð hildið.

Gudfrøðilesturin, sum setrið fór undir í 1976, er fyribils einasta úrslit, sum kom burtur úr tí drúgva tilmæli, setursráðið legði fyri landsstýrið í 1975, eftir at tær áðurnevndu 11 nevndirnar høvdu lokið sítt verk. 2-ára fyrireikandi prógvlestur í gudfrøði varð settur á stovn.

Hesi bæði lestrarárini komu eftir avtalu við universitet í Danmark og Íslandi at telja við sum partur av gudfrøðiligum embætisprógvi.

Sóknarpresturin Petur Martin Rasmussen og Hans Jacob Joensen vórðu settir til at leiða hesa útbúgving, har allir lærararnir vóru tímalærarar. Útbúgving var fyri fyrst bert ein roynd, men á vári í 1978 gjørdi setursráðið av at seta Gudfrøðideildina á stovn. Ætlanin við hesi deild var umframt at skipa fyri undirvísing, at hon eisini skuldi koma at virka sum granskingarstovnur innan føroyska kirkjusøgu og føroyskt trúarlív og sum bibliutýðingarstovnur. Tað var bert roknað við einum hálvum fastum starvi á deildini, og ein samskipan fekst tí í lag við Føroya Læraraskúla, soleiðis at deildarleiðarin helvtina av arbeiðstíð síni skuldi undirvísa á læraraskúlanum. 1. august 1980 varð Lisbeth Michelsen, cand.theol., sett sum deildarleiðari á Gudfrøðideildini. Hon sat í hesum starvi til 1983. Eftirmaður hennara er Petur Martin Rasmussen, cand.theol., ið varð settur í starv 1. august 1983.

Gudfrøðilesturin var til og við 1983 skipaður sum ein partur av gudfrøðiligum embætisprógvi; endaligt prógv mátti takast aðrastaðni. Frá heystið 1983 er skipað so fyri, at tað nú eisini ber til at taka hjágrein ella exam.art.-nám í kristni/religión við Fróðskaparsetrið.

Hægri útbúgvingar, sum ongantíð komu

Tær áður umrøddu 11 nevndirnar, sum eftir tilmæli frá setursráðnum og við góðkenning landsstýrisins vórðu settar í juli 1974, fingu til setning at kanna

> tørvin á hægri lestri her heima í Føroyum, tá ið hugsað verður um framtíðararbeiði fyrst og fremst hugsað verður um læraratilboðið, men eisini um aðrar umstøður -- eitt nú stovnar, *kostnaðin* av slíkum tiltaki.

Nevndirnar gjørdu eitt dygdararbeiði, og 1.11.1975 kundi setursráðið leggja tilmæli fyri landsstýrið, har uppskotini vóru býtt í tríggjar bólkar.

Útbúgvingar at byrja september 1976:
Fiskiíðnaður, edv, fyrisiting og gudfrøði
Útbúgvingar at kanna framvegis:
Lærarastørv, læknafrøði, ravnmagnstøkni og bóksavnskunnleiki.
Útbúgvingar at útseta fyri fyrst:
Sjúkrasystrastørv, blaðmanna,- og útvarps- og sjónvarpsvirki og landbúnaður.

Landsstýrið tók undir at fremja útbúgvingarnar í fyrsta bólki, tó so at fiskiíðnaður og edv vegna hølistrot skuldi stoðga eitt ár. Í fyrstu atløgu valdi løgtingsins fíggjarnevnd fyrisitingarútbúgvingina, men treytað av at játtanin til setrið ikki varð økt í tí sambandinum. Samstundis hevði fíggjarnevndin kravt munandi niðurskurð í fíggjarætlan setursins sum heild. Sostatt datt henda útbúgving niðurfyri. Tá ið av tornaði, samtykti tingið at játta eina lítla peningaupphædd til gudfrøðideild við setrið.

Magnus Danielsen, sum í 2 ár var lærari á Støðisútbúgvingini og aftur starvaðist á Danmarks tekniske Højskole, beyð sær til at halda fram við kanningini av útbúgving í ravmagnstøkni. Í 1977 greiddi hann vala álit úr hondum um 3 ára hægri útbúgving í tøkni (fleiri greinir). Tríggjar ferðir søkti setursráðið um játtan til útbúgvingina, seinastu ferðina til eina avmarkaða 3 ára hægri útbúgving við ravmagns- og maskintøkniligum innihaldi og orku sum sergrein. Men eingin játtan fekst.

Í sínum lagi hevur Støðisútbúgvingin gjørt royndir at fúa í lag edv útbúgving í framhaldi av og saman við støðisútbúgving. Tær hava ikki eydnast.

Setursráðið hevur viðgjørt uppskot um serligt ársnám í mentanarfrøði, serliga føroyskari mentan og siðsøgu og søkt um játtan. Fyribils úrslitið varð, at ein lærugrein á læraraskeiðum setursins gjørdist føroysk mentan og siðsøga.

Heilsufrøðilig Starvsstova

Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum varð stovnsett við løgtingslóg frá 6. mai 1975, var upprunaliga ætlað sum deild av Fróðskaparsetrinum.

Ein sjálvboðin nevnd, sum í januar 1969 setti sær fyri at gera uppskot til »neyðugar starvsstovur« m.a. í sambandi við nýggja heilsusamtykt og vaksandi tørv á eftirliti við matvørufremleiðslu, serstakliga til útflutnings, legði uppskot úr hondum í juni 1971 og tekur m.a. soleiðis til í skrívi sínum til Fróðskaparsetrið:

»Nevndin er øll samd um, at tað tí í allar mátar vildi verið ein stórur fyrimunur, um hesar starvsstovur verða knýttar til Fróðskaparsetur Føroya. Hetta ví hava við sær stórar undirvísingarligar fyrimunir bæði á setrinum sjálvum, men ikki minni, tá ið hugsað verður um skeið fyri fólki, sum í framtíðini kemur at starvast í okkara høvuðsvinnu, matframleiðsluni.

Við teirri nógv vaksandi undirvísing, sum hevur verið og er á Fróðskaparsetrinum, hava vit eisini havt í huga, at tað ivaleyst hevði verið ein fyrimunur hjá setrinum, um tann afturatbygging, sum tykist neyðug, og tann nýbygging, sum krevst til úðurnevndu starvsstovur, varð gjørt í einum undir somu lon á Debesartrøð.«

Setursráðið legði málið fyri landsstýrið, sum í sínum lagi legði tað fyri tingið, har tað varð samtykt treytað av endaligum byggiuppskoti við kostnaðar- og rakstrarætlan. Bygginevnd varð sett av ráðnum, og tað eydnaðist avgreiðslunevnd selursins at útvega lán til byggingina, men í sínum áliti frá apríl 1972 sigur figgjarnevndin, at hon »heldur ikki at tikið eigur at verða við hesum lánitilboði, men at landskassin leggur byggipeningin út í fyrsta umfari.«

Bygginevndin gjørdi tað neyðuga iskoytisuppskotið, sum setursráðið síðan við tilmæli legði fyri landsstýrið. Í apríl 1972 samtykti løgtingið einmælt, »at bygt verður sum deild av Fróðskaparsetri Føroya evnafrøðilig og bakteriologisk starvsstova.«

Sjálvbodna nevndin kom í november 1973 til tað úrslit, at starvsstovan skuldi verða skipað sum sjálvstøðugur stovnur, knýttur at Fróðskaparsetri Føroya viðvíkjandi undirvísing og rannsóknum, og stýrd av eini 5-mannanevnd, harav Fróðskaparsetrið velur 1 lim. Við løgtingslógini frá 1975 varð »Heilsufrøðiliga starvsstovan«, sum hon kom at eita, løgd undir landsdjóralæknaembætið, men hevur sum eitt av endamálum sínum: »á sínum virkisøki og í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya at gera vísindaliga gransking og geva praktiska undirvísing.«

Av teimum, sum arbeiddu við málinum um Heilsufrøðiligu starvsstovuna, nevndu hesir beinleiðis tilknýti til setrið: H. D. Joensen, landslækni, í sjálvbodnu nevndini og í bygginevndini, Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, og Jóannes Rasmussen, statsgeologur, í bygginevndini. 1971-75 er málið til sum setursmál.

Gransking

Lærararnir á setrinum hava í mesta lagi helvtina av arbeiðstíð síni til undirvísing, hin parturin er roknaður til gransking og vísindaligt arbeiði umframt nakað av fyrisiting. Hjá summum lærarum, ið hava serligar skyldur at røkja, kann minkast sum undirvísingarpartin.

Fyri setrið sum heild var upprunaliga hugsanin tann, at tann hægra undirvísingin og tað vísindaliga rannsóknararbeiðið skuldi fara fram í neyvum samstarvi við hinar granskingarstovnarnar her á landi. Hetta varð sagt í viðmerkingunum til uppskotið um stovnseting av Fróðskaparsetri Føroya í 1965, og tað

er tað, sum liggur aftan fyri § 2 í reglugerðini fyri Fróðskaparsetrið:

»At fremja hesi endamál styðjar setrið seg til søvn og mentunarstovnar landsins. Fyristøðumonnum fyri hesum stovnum verður álagt at hava høli og søvn teirra í tílíkum standi, at tey eru nýtilig til hettu endamál. Fyristøðumonnunum fyri stovnum verður loyvt at átaka sær undirvísing og vegleiðing av teimum, sum leita sær kunnleika við setrið, og verður tað eisini loyvt teimum at røkja hetta í vanligu arbeiðstíð teirra.«

Tá Fróðskaparsetrið kom, var næstan á øllum granskingarstovnunum bert fyristøðumaðurin, ið var vísindalig útbúgvin. Hugsanin var tann, at ikki bert granskingin, men eisini undirvísingin skuldi fara fram á stovnum, soleiðis at stovnarnir í fleiri førum komu at virka sum »institutt«. Hetta var júst tað, sum frá byrjan hendi í sambandi við skeiðini í náttúrusøgu, sum fóru fram á Náttúrugripasavninum. Bæði setursráð og landsstýri hava sostatt hugsað sær granskingarstovnarnar og Fróðskaparsetrið sum eina undirvísingarliga og granskingarliga heild. Hetta verður eisini greitt í § 7 í reglugerðini: »Fast tilnevndu lærararnir og fyristøðumenninir fyri teimum stovnunum, har undirvísing og rannsóknararbeiði fer fram í samstarvi við Fróðskaparsetrið, gera tilsamans rannsóknarráð setursins.«

At rannsóknarráðið og ongantíð kom at virka, er ein annar spurningur.

Vísindaliga rannsóknarstarvið er eitt sindur ymiskt á teimum ymisku deildunum. Føroyamálsdeildin hevur t.d. vísindaligt arbeiði bundið at søvnunum á deildini. Deildin hevur orðasavn, fólkaminnissavn, staðanavnasavn og málførasavn (dialektsavn). Tað verður alsamt økt um hesi søvn, og tað nógva av granskingini á deildini hevur tilknýti til hetta savningararbeiði. Vísindaliga manningin á deildini telur fýra fólk, sum virka ávikavist innan orðabókaarbeiði, staðanavna- og málførarannsóknir, fólkaminnisfrøði serliga kvæðagransking, og bókmentagransking.

Granskingin á Støðisútbúgvingini er ikki bundin at søvnum, men har verða gjørdar fleiri størri og minni kanningar ella prosjekt. Vísindaliga manningin á deildini telur ein alisfrøðing, ein lívevnafrøðing og ein hag-, dátu- og steddfrøðing. Afturat hesum kemur eitt starv í lívfrøði á Náttúrugripasavninum, sum verður lønt av Fróðskaparsetrinum móti at Náttúrugripasavnið hevur átikið sær undirvísingarábyrgdina í lívfrøði á Fróðskaparsetrinum. Tað eru gjørdar fleiri kanningar innan lívfrøði, t.d. fuglateljingar. Eisini eru teir í ferð við eina kanning av føðsluvirðinum í føroyskum mati. Innan alisfrøði eru kanningar serliga farnar fram innan havfrøði og orku. Støðisútbúgvingin hevur rættiligga framkomna edv-útgerð. Kunnleika innan støddfrøði og hagfrøði hevur eisini verið til stuðuls í øðrum granskingararbeiði. Næmingarnir hava eisini fyri stóran part tikið lut í granskingararbeiðinum tey fyrstu árini. Hetta var liður í útbúgvingini. Her kann t.d. verða nevnt eitt prosjekt um rúsdrekka, eitt um geislavirkni og ein størri kanning av Skálafirði.

Á Gudfrøðideildini kom fast vísindaligt starv ikki fyrr enn í 1980. Ætlanin er,

at henda deild skal vera granskingarstovnur innan føroyska kirkjusøgu, men við bert hálvum starvi, ið hevur stóra undirvísingarbyrði, hevur ikki borið til at skipa fyri stórvegis deildarfyriskipaðari gransking.

Tað eru altíð fleiri liðir í øllum granskingararbeiði, og allir hava sama týdning: savnan av tilfari, skipan og viðgerð av tilfarinum og endiliga ítøkiliggeringin av granskingini í einum skrivligum arbeiði, sum er atkomuligt hjá áhugaðum og helst prentað. Tað hevði helst verið rætt at fingið ein størri part av granskingarúrslitunum á Fróðskaparsetrinum upp á prent.

Stýrisskipan setursins

Í sambandi við umrøðuna av stovnsetingini av Fróðskaparsetrinum er sagt eitt sindur um stýrisskipan setursins. Tann lóg, sum kom í gildi í 1965, og reglugerðin, sum varð lýst sum kunngerð í 1968, hava verið galdandi øll árini. Sum nevnt telur setursráðið 5 limir, landsbókavørðin og roktaran fyri Føroya studentaskúla umframt tríggjar limir, sum Føroya Fróðskaparfelag velur.

Á hvørjum ári velur setursráðið ein av limum sínum til formann og ein til næstformann. Formaðurin, næstformaðurin og ein aðalskrivari, sum setursráðið eisini velur, gera avgreiðslunevnd Fróðskaparsetursins. Longu á fyrsta setursráðsfundinum 24. mai 1965 varð aðalaskrivari valdur. Hann hevur øll árini verið Johan Djurhuus, skrivstovustjóri í Føroya landsstýri. Sbrt. reglugerðini er uppgávan hjá aðalskrivaranum at vera lógkønur ráðgevi setursins og at føra gerðabók, annars virka saman við hinum limunum í avgreiðslunevndini.

Eftir lógini skal setursráðið hava ikki færri enn 4 fundir árliga. Á fundunum luttóku upprunaliga bert ráðið og aðalskrivarin, sum síðan 1974 hevur verið ráðslimur valdur av Føroya Fróðskaparfelag, og seinni eisini setursskrivain. Harumframt fekk tann landsstýrismaður, undir hvørs arbeiðsøki setrið hoyrdi, eisini fundarboð. Yvirhøvur hava landsstýrismenninir verið á setursráðsfundunum. Lærarar komu ikki á fund, uttan teir vórðu boðsendir. Hetta broyttist alt fyrst í 1970-árunum, og við eini serligari fyriskipan, sum kom í gildi í 1975, fingu deildarumboð og næmingaumboð rætt at møta á setursráðsfundi við framløguna av málum. Tey fyrstu árini fór fyrisitingin fram á tann hátt, at avgreiðslunevndin avgreiddi tey mál, sum vóru viðgjørd á setursráðsfundi. Til 1974 var bert ein skrivari í hálvum starvi, sum kortini fekk ein lærling aftur at sær í 1972.

Í 1974 fór Jóannes Rasmussen frá sum formaður, og H. D. Joensen tók við. Í hesum sambandi varð fyrisitingin broytt. Skrivarastarvið varð umskipað til leiðarastarv við serligum verk- og ábyrgdarøki (heitið setursskrivari varð samtykt árið eftir). Avgreiðslunevndin kom nú í mongum førum at virka sum eitt setursráð í smálíki, tí setursráðið hevði lítið avgreiðslunevndina upp í hendur at taka avgerðir í ávísum málum. Tað er og hevur øll tey senni árini verið so, at tað, sum ikki hoyrir beinleiðis undir deildirnar, verður fyrisitið av setursskrivstovuni, t.d. kvøldskeiðini og kvøldfyrilestrarnir. Gudfrøðideildin hevur dagliga fyrisiting

saman við setursskrivstovuni, sum eisini hevur fyrisitingarligu leiðsluna av lærara-skeiðum setursins. Samanum tikið kann sigast, at fram til 1974 var bæði fyrisitingarliga og fakliga leiðslan á setrinum dagliga í hondunum á avgreiðslunevndini og serliga formanninum.

Eftir 1974 er dagliga fyrisitingarliga leiðslan savnað í hondunum á setursskrivaranum, meðan fakliga leiðslan er spjadd. Setrið hevur ongan fakligan leiðara ella rektara í vanligari merking, men setursráðsformaðurin hevur í ávísum førum umboðað setrið sum rektari:

Limir í setursráðsnum hava verið:
1965-1968 Sverri Fog, landsbókavørður
1965-1974 Jákup S. Joensen, statsbiol.
1965-1977 Hans Debes Joensen, landsl.
1965-1977 Jóannes Rasmussen, stategeologur
1965- Arnbjørn Mortensen, rektari
1968- Sverri Egholm, landsbókavørður
1974- Johan Djurhuus, skrivstovustjóri
1977-1983 Hans J. Joensen, søknarprestur
1977- Jóan P. Joensen, savnavørður
1983- Høgni D. Joensen, landslækni

Formenn:
1965-1974 Jóannes Rasmussen,
1974-1977 Hans Debes Joensen,
1977-1979 Johan Djurhuus,
1979-1980 Hans Jacob Joensen,
1980- Jóan Pauli Joensen,

Í lógini og kunngerðini fyri setrið eru umrødd lærararáð og rannsóknarráð, sum bert hava ráðgevandi myndugleika. Lærararáðið »skal verða spurt í øllum undirvísingarmálum og yvirhøvur í øllum málum, sum hava við vísindaligu undirvísingina at gera, og eisini tá ið lærarar skulu setast« eisini skal lærararáðið sbrt. reglugerðini fyri setrið leggja undirvísingarætlanir og fyrilestrarætlanir setursins fyri eitt ár í senn. Hetta seinna er broytt so við og við, sum setrið er vaksið og hevur fingið fleiri deildir. Lærararáðið hevur sínar viðtøkur, góðkendar av landsstýrinum, og lærararáðsformaðurin og næstformaðurin verða valdir fyri 2 ár í senn.

Rannsóknarráðið er umrøtt í reglugerðini; í hesum ráð skulu sita fast tilnevndu lærararnir við setrið og fyristøðumenninir fyri teimum stovnum, har undirvísing og rannsóknararbeiði fer fram í samstarvi við Fróðskaparsetrið. Rannsóknarráðið er sum áður nevnt tíverri ongantíð komið at virka.

Í 1975 samtykti setursráðið skipan fyri deildirnar á Fróðskaparsetri Føroya. Tá varð staðfest, at »leiðslan á hvørjari deild sær stendur fyri fyriskipanini av undirvísing og gransking. Í hesum málum umboðar leiðslan deildina yvir fyri øðrum stovnum«. Leiðslan á deildunum hevur, til nýggjar reglugerðir eru komnar, ávikavist fyri Støðisútbúgvingina í 1981 og Føroyamálsdeildina í 1982, ligið í hondunum á deildarstjóranum. Kortini hevur Støðisútbúgvingin longu í 1972 eitt støðisráð við fleiri undirnevndum, og heystið 1976 fekk Føroyamálsdeildin

eitt deildarráð. Deildarráð eru nú bæði á Føroyamálsdeildini og Støðisútbúgvingini. Størvini sum deildarstjóri eru ikki til longur, men deildarráðið velur ein av limum sínum til deildarráðsformann. Umframt lærarar eru eisini starvsfólk umboðað í deildarráðnum, og á Føroyamálsdeildini hava næmingarnir eitt umboð. Harumframt er á hvørji deild eitt lestrarráð. Næmingarnir eiga teir tríggjar av teimum seks limunum. Í sambandi við skipanina fyri deildirnar fingu umboð fyri deildirnar bæði rætt og skyldu at møta á avgreiðslunevndar- og seturráðsfundum við framløguna av málum deildini viðvíkjandi. Eisini næmingarnir fingu í hesum sambandi rætt til at møta á seturráðsfunum við framløguna av málum í sambandi við undirvísingina.

Tað hava verið sett fram uppskot um broytingar í stýrisskipan setursins av og á. Ein nevnd arbeiðir í løtuni við hesum máli.

Hanus og Jóannes

»Fróðskaparsetrið er líðandi vaksið fram úr teimum søvnum, sum vóru, og tí virksemi, sum fór fram á Debesartrøð. Tað ber beinanvegin til at siga, at stavnhaldið hevur verið og er enn at granska og búgva út føroyska samfelagið, at lýsa tær serligu umstøðurnar, ið her eru, og úrslitini av teimum og tey eyðkenni, sum sermerkja okkum føroyingar — fremst teirra málið.«

Hesi fáu orð, sum táverandi seturráðsformaðurin Hans Debes Joensen m.a. segði í einum fyrilestri um undirvísingina á Fróðskaparsetrinum 27. februar 1975, lýsa í stuttum gongdina. Nógv av tí, sum kom at vera eftir 1952, varð hugsað longu í krígsárunum, meðan H. D. Joensen og Jóannes Rasmussen vóru í Danmark. Hin vegin ber ikki til at siga (sbrt. Jóannes Rasmussen), var Fróðskaparfelagið er ein beinleiðis ávøkstur av hesum.

Uttan at taka nakað frá nøkrum, so vóru Jóannes Rasmussen og Hanus Debes Joensen sálin í meginpartinum av tí virksemi, sum fór fram innan felag og setur, til teir báðir fóru úr felagsnevndin og setursráðnum 17. desember 1977. Í Skørunni (1983:4) greiðir H. D. Joensen soleiðis frá samstarvinum teirra millum:

»Jóannes Rasmussen og eg komu ikki at kennast væl fyrr enn seinast í lestrarárum mínum. Uppruni okkara og fortreytir vóru ógvuliga ymisk. Hann kom úr fremstu mentanarborg okkara, har menn høvdu gjørt roysni. Ég frá fólkum, sum góð vóru við alt føroyskt, og sum meira høvdu roynt at arbeiða í lí stilla innan skúlagátt, men ongantíð høvdu fingið orðið fyri seg. Tað, sum helst dró okkum saman, var felags andstygd fyri øllum stórum orðum og veruleikafjarum kroysti: Kenslan av, at skuldu vit saman gerast førir fyri at útinna eitt lítið sindur, ráddi um altíð at draga eina línu - - ongantíð at klandrast, hóast vit ikki altíð vóru heilt samdir, ongantíð at nýta hørð orð, ongantíð at leggja upp í blaðkjak. Og aldri at spilla burtur tíð okkara við beinleiðis at fara upp í politikk....Tað sindrið, Jóannes og eg hava avrikað, varð altíð gjørt felags. Haldi hvørgin minnist, hvør ið fekk fyrsta innskotið til hetta og hvør til hatta. Vit loyvdu okkum øll árini eina løtu, at siga hvønn einasta dag, at práta saman. Vit royndu at bera so í band, at

Fróðskaparfelagið sjálvt skuldi fyrst hava fingið nakað av skafti í hvørjum tiltaki, áðrenn roynt varð eftir studningi frá peningastovnunum ella tí almenna. Og vit løgdu annars í at halda tann setning, ið var lovaður -- eisini figgjarliga. Krókvegirnir, vit noyddust at fara, vóru nógvir. Men lat fara. Yvirhøvur var undirtøkan bæði frá politikarunum og teimum stóru peningastovnunum ólør. Annars mundi lítið spurst buturúr. Stavnhaldið var altíð at byggja upp eitt lærdómssetur. Einki kemur burtur úr at vera svartskygdur. Men heilt so nógv, sum vit høvdu ætlað, er tíveri ikki komið burturúr. Kanska mest av tí, at danir spiltu okkum spælið við at broyta tað hægra undirvisingarlagið og serliga fyristitingina av tílíkum stovnum. Eftir okkara tykki fór so nógv tíð til at fundast og at hoyggja í pappírsdungum, at okkum leiddist við tað«.

Hóast at H. D. Joensen var lækni og Jóannes Rasmussen jarðfrøðingur, t.e. at hádir høvdu sína útbúgving innan náttúruvísindi, so var tað ikki ein skúla innan náttúruvísindi og tøkni, teir fyrst hugsaðu um. Tað, sum lá teimum upp á hjarta, var at fáa sett á stovn eitt fróðskaparsetur, har tjóðareydkennini føroyskt mál og mentan fyrst av øllum skuldu fáa innivist sum granskingarevni og lærugreinir. Tað, sum hevði størstan týdning fyri teir, var at fáa Christian Matras heim til Føroya at vera professara í føroyskum á Føroyamálsdeildini. Tað var hann, sum fyrst av øllum skuldi geva Fróðskaparsetrinum tign og vísindaligt eydkenni. Føroyska málið átti at koma fyrst og annað so við og við, sum ráð og umstøður vórðu til tess.

Meðan t.d. Sverri Dahl og Jóannes Rasmussen vuksu upp í einum tjóðskaparligum og málsliga sera medvitandi umhvørvi, ávikavist. í Sandagerði hjá Jákupi Dahl prósti, og á Føroya Fólkaháskúla, so vaks Hans Debes Joensen upp í einum umhvørvi, har aðrir spurningar enn hesir vóru neina átrokandi. Tað er kanska júst tí, at Hans Debes Joensen er tann treiskasti og miðvísasti í málsligum spurningum. Føroyskt um skyldubundin lærugrein ella fastur táttur í allari dagundirvísing á setrinum var eitt hjartamál hansara. Viðhvørt fær ein næstan ta fatan, at málrøktin fyri hann hevur størri týdning enn bæði tann hægra undirvísingin og granskingin. M.a. segði hann á aðalfundi felagsins 17. desember 1971:

»Tað er stuttskygt at halda, at vit hava vunnið upp undir land, serliga nú og næstu ár er og verður áganguriin á alt føroyskt harður, eina mest málsliga. Felagið hevur undir liðini á sær eina gróðrarnál, sum gerast kann livdargarður fyri øllum føroyskum saman við almennari menning, men eisini — um ikki rætt og hóvliga verður borið at — kann gerast eitt haft og ein spilla, ein smoga fyri bráðræsi og líkasælu, eg hugsi her aftur um tað málsliga, sum — hvussu víkur og vendir — altíð fer at verða okkara meginvernd og aðaleydkenni. ...Meira, vit leggja inn undir okkum av hægri undirvísing, størri verður vandin fyri málið, tá ið vit sjálvir ikki eiga menn — ella nóg hugaðar menn — sum skilja ella leggja lag í henda vandan.«

Viðmerkingar at enda

Tað sæst greitt, at tað sum menn av fyrstu tíð hugsaðu sær, var eitt akademi ella fróðskaparsetur, sum skuldi stíla fyri gransking og undirvísing innan vísindi, sum vit í dag vildu nevnt tjóðvísindagreinir, t.e. føroyska málið, føroyskar bókmentir, føroysk mentan, søga og samfelag og so sjálvandi »filosofikum«, sum tá var kravt við øll universitet í Danmark har flestir føroyingar fóru at lesa, men kanska »eisini gransking og kanska undirvising í fiskalívfrøði.« Hetta var stutt tað, sum menn roknaðu við og sum var ført fram á aðalfundinum í Fróðskaparfelagnum 17. desember 1964, beint áðrenn uppskot um stovnan av Fróðskaparsetrinum varð sent landsstýrinum. Hesum ætlanum fylgdu menn eisini øll tey fyrstu árini. Men tær broytingarnar, sum fóru fram í Danmark tey tvey seinastu árini av 1960-unum, nómu eisini við Fróðskaparsetrið. Støðisútbúgvingin kom. Tað er eingin ivi um, at støðisútbúgvingarhugsjónin hóskar sera væl til føroysk viðurskifti, men henda útbúgving kom at kosta pening, sum kanska hevði verið betur farin — samanber ætlanina í 1967 um »Færoikum« — um hann varð lagdur niður í aðrar verandi náttúruvísindaligar granskingarstovnar, sum kunu at virka sum institutt í sambandi við náttúruvísindaliga útbúgving. Mín persónliga meting er tann, at antin skuldi støðisútbúgvingin als ikki verið komin, ella skuldi hon verið framd sum útbúgvingarsjónarmið á øllum deildum setursins, soleiðis at vit eisini fingu samfelagliga og humanistiska støðisútbúgving. Gongdin kom í staðin at vera tann, at undirvísingin í náttúruvísindum kom at fylgja einum undirvísingarsjónarmiði, undirvísingin í føroyskum einum øðrum, og undirvísingin í kristni einum triðja. Tað hevði sjóðað setrið sum heild meira saman, um undirvísingargrundarlagið á øllum deildum var tað sama.

»Endamál setursins er vísindaligt rannsóknarstarv og hægri undirvísing«, verður sagt í løgtingslógini um stovnsetanina av Fróðskaparsetrinum. Tað er ikki ráðiligt at hava fleiri hægri lærustovnar í Føroyum. Tað vísindaliga umhvørvið er lítið frammanundan, og skal tað syndrast sundur, so verður eingi burturúr. Tað er tí púra greitt, at alt, sum kemur undir heiti hægri útbúgving ella hægri undirvísing, eigur at fara fram á Fróðskaparsetri Føroya, ella í neyvum samstarvi við setrið.

Lærarar, sum undirvísa á einum hægri lærustovni, eiga at hava gransking ella vísindaligt rannsóknararbeiði sum annan tátt í starvi sínum. Tað eigur ikki bert at vera ein rættur, men eisini eitt krav, at tey fólk, sum undirvísa á setrinum, gera vísindaligt rannsóknararbeiði. Her eigur ikki at verða hugsað um vísindi í alt ov neyvari merking, t.d. eigur tað at skriva lærubøkur til nýtslu í føroyska skúlaverkinum á øllum stigum eisini at verða høgt mett. Kravið til ágrýtni innan gransking eigur ikki at verða minni av teirri orsøk, at vit liggja butangoyma í mun til onnur vísindalig umhvørvi við stórum universitetum. Vit eiga at skipa fyri vísindaligum rannsóknararbeiði á teimum økjum, har vit hava serliga fortreytir.

Í flestum førum kemur hægra undirvísingin her hjá okkum at verða styttri

starvsvendar útbúgvingar bygdar oman á ein kjarna við hægri útbúgving, t.d. støðisútbúgving ella prógvi í føroyskum. Her eigur eisini at verða víst til tað nevndararbeiði, sum Fróðskaparsetrið skipaði fyri við góðkenning landsstýrisins í 1974.

Vit eiga eisini at geva teimum studentum, sum lesa við lærustovnar uttan fyri Føroyar, møguleika at taka evni um føroysk viðurskifti upp í lesnaði sínum, kanska beinleiðis skipa fyri granskingarprosjektum, sum studentar kunnu taka lut í og helst fáa serritgerð burturúr. Eisini kundi eg hugsað mær, at tað skuldi verið møguligt at tikið fulla akademiska útbúgving, men soleiðis at hon heilt og aldeilis varð skipað eftir teimum møguleikum, sum vit hava, og gjørd til tann einstaka studentin. Her skuldi fakligi kunnleikin gjørt av, hvat var ráðiligt, og hvat ikki var ráðiligt.

Eg eri fullvísur í, at skulu vit gera nakað nýskapandi, skulu vit líta á okkara egnu fyritreytir, laga okkum eftir okkara egna náttúrliga, samfelagsligu og mentanarliga umhvørvi. Vit skulu hyggja eftir øðrum, men ikki skriva av eftir øðrum, tí so verður tað, sum tað ofta verður í Føroyum, at vit hanga við ta avskriftina, vit eina ferð hava gjørt, meðan tey, sum í síni tíð evnaðu frumritið til, fyri langari tíð hava slept tí.

Summary

Føroya Fróðskaparfelag (Societas Scientiarum Færoensis) was established in 1952. Ever since the Society has published tha annual Fróðskaparrit (Annales Societatis Scientiarum Færoensis) with articles on all branches of knowledge.

In its early days the Society concentrated on collecting linguistic material and preparing dictionaries. A language advisory board, Málstovnurin, was established in 1958.

A book exchange arrangement was made with institutions in many countries, and thus a comprehensive and valueable collection of scientific literature was provided.

In 1964 the Society arranged the first course in Faroese language and literature for schoolteachers and other students. At the same time the Museum of Natural History arranged courses in natural sciences. The outcome of these activities was the foundation of an institution of higher education, and this was achieved when, in 1965, the Fróðskapasetur Føroya (Academia Færoensis) was established with the object of undertaking research and higher education. Today there are three departments: the department of Faroese language and literature, the department of natural sciences, and the department of theology. Nine fulltime teachers are responsible for the 2-year courses given at three departments.

In this article the history of the Society and the Academy is outlined since their establisment. Two men are regarded the pillars of boat the Society and the Academy: Hanus Debes Joensen, dr. med., and Jóannes Rasmussen, dr. scient. h.c.

Álit um
Fróðskaparsetur Føroyar

Fylgiskjal 2
6 bls.

Um skipan Fróðskaparseturs Føroya

Nú ið landsstýrið hevur sett nevnd at viðgera spurningar um framtíðarskipan setursins, skal Føroyamálsdeildin her loyva sær at seta fram nakrar fyribils hugleiðingar nevndini til umhugsanar.

Navnið

Navnið **Fróðskaparsetur Føroya er bæriligt** og **væl kent** og eigur tí at verða varðveitt óbroytt. Latínska undirheitið Academia Færoensis eigur helst ikki at verða broytt beinan vegin, tí tað verður valla í bræði, at heiti »universitas« kann verða tikið upp. Hetta kann støða verða tikin til, tá ið tørvur er á.

Deildir

Hvussu skipan setursins í deildir eigur at vera í staklutum, kann orðaskiftast um. Men bestu ráðini eru eftir okkara tykki at skifta greinirnar í tvinnanda høvuðsbólkar (sí hjálagda yvirlit):

Serføroysk evni

Serføroysk — tjóðskaparlig — evni, sum yvirhøvur samsvara við hugvísindaligar ella søguligar/heimspekiligiar greinir, og sum ikki kunnu verða lisnar til lítar uttan í Føroyum. Tað er tjóðarskylda at røkja gransking og nám í tílíkum greinum her á landi.

Almenn evni

Almenn evni, sum samsvara við greinir, ið eru at lesa á flestum universitetum, og eru bæði betri og bíligari at lesa har. Besta leiðin er at játta pening til styrkir og lán til lærarar at fáa sær eftirútbúgving í útlondum og til studentar til at nema tær lærugreinir, ið her eru í boði. Stovnaður verður føroyskur studnings og lánsgrunnur samsvarandi við líkar skipanir í øðrum Norðurlondum.

Endamál

Høvuðsendamálini hjá setrinum eiga at vera
1) at fremja gransking
2) at útbúgva fólk til undirvísingar á hægri stigi í serføroyskum evnum í tilknýti til námsgrein teirra.
Fróðskaparsetrið eigur at vera til stimburs fyri føroyskt mál og mentan í øllum viðurskiftum. Tað er eisini ætlandin serliga at røkja føroyska mentan, søgu og mál í eini tíð, sum hættisliga grevur undan mentanini hjá smáum tjóðum.

Kemur tað so langt, at Føroyar verða veruliga tvímælt land, verður føroyskt uttan iva við undirlutan, um ikki tey, ið ábyrgdina hava, kenna skyldur sínar og eru á varðhaldi.

Tað krevur ávísa tíð at byggja upp tílíkan lærdómsstovn. Hvussu langa tíð, tað tekur, veldst um tørv og fíggjarjáttanir. Upphyggingin má henda so liðandi, og serføroysku greinirnar eiga sum nevnt at fáa fremsta sess. Í royndum eru tað málsøgu- og heimspekingreinirnar, sum eingir aðrir lærdir háskúlar granska ella geva undirvísing í. Føroyingar hava eina serliga skyldu til at søkja og menna tær tjóðskapligu greinirnar, tí at tær eru stoðí undir føroyskari mentan, sum hon kemur til sjóndar í máli, kvæðum, søgu, bókmentum, fólkalívi o.ø

Stýrislag

Fróðskaparsetrið eigur at vera sjálvstýrandi stovnur innan fyri teir fíggjarkarmar, ið løgtingið setur. Høvi eigur at vera til at fáa eykaveitingar til serlig verkevni, sum hava skund eitt nú av tjóðskapligum orsøkum.

Fyri Fróðskaparsetrið verður sett ein rammulóg. Allar stýrisreglur og -samtyktir eiga at verða viðgjørdar innanseturs av avvarðandi serdeild og samtyktar av setursráðnum. Løgtingið veitir fíggjarjáttan til setrið undir einum. Ráðið býtir veitingarnar út til megindeildirnar eftir ávísum lutfalli. Megindeildarformaður hevur ávísingarrætt. Í vissum førum kann hesin rættur verða latin serdeildarformonnum.

Setursráðið er samansett av valdum umboðum. Øll umboð eru tíðarbundin, og umboðini verða vald av teirri deild, tey eru knýtt at. Eingir »føddir« limir sita í setursráðnum. Setursrektari og vararektari verða valdir av øllum, ið starvast á setrinum eftir nærri reglum. Studentar hava umboð í stýrisgøgnum eftir nærri reglum og við vissum avmarkanum. Studentar kunnu ikki hava umboð í prógvnevndum. Landsbókasavnið (vísindadeildin) og Landskjalasavnið kunnu eftir nærri reglum senda hvørt sítt umboð á setursráðsfund.

Nevndir

Undir Fróðskaparsetri Føroya kunnu verða settar ymsar fastanevndir, t.d.
1) undir ráðnum: Høvuðsfíggjarætlanarnevnd, lestrarætlananevnd, skeið- og upplýsingarnevnd (til at røkja sambandið við almenningin, til upplýsingar starvsemi, eitt nú kvøldfyrilestrar o.s.fr.)
2) undir megindeildunum: Fíggjarætlanarnevnd og
3) undir serdeildunum: Lestrarætlanarnevnd.

Prógv

Endalig embætisprógv kunnu verða útskrivað av Fróðskaparsetrinum. Tey verða samansett av serføroyskum pørtum, sum eru tiknir á Fróðskaparsetrinum, og ískoytisgreinum í almennum evnum, sum eru tiknir á lærdum háskúlum uttanlendis eftir nærri avtalu.

Manning

lærdómstitlar

Á eini serdeild er vanliga manningin: Professari, (Professari II), lektari (ella amanuensis), vísindaligt atstøðarfólk (»vit.as«), styrkhavi (stipendiat), starvsfólk.

Samstarv millum nærskyldar námsgreinir — bæði vísindaligari gransking og undirvísing — eigur at vera eftir serligum reglum.

Fróðskaparsetrið eigur at kalla til sín gestlærarar (professarar, lektarar o.a.) og tímalærarar annaðhvørt í áramál ella fyri styttri tíð.

Spurningurin um gestlærarar goldnar við norðurlendskum peningi eigur serliga at verða tikin til umhugsanar.

Fólk, ið starvast á øðrum vísindastovnum og sum hava professaraførleika, kunnu fáa starvsheitið professari (II). Førleiki teirra verður mettur av serligari dómsnevnd. Fyri ávísa lønarviðbót kunnu tey undirvísa á Fróðskaparsetrinum. Tey hava skyldu til at taka lut í prógvtøkum og taka á seg vald álitisstørv á setrinum.

Longu nú eiga at verða settar serstakar dómsnevndir til at meta um tey, ið nú sita á høvuðsstarvi og sum vilja taka á seg størv og skyldur sum professarar (II).

Á sama hátt kann starvsheitið lektari (II) í serstøkum førum eisini koma á tal.

Rit

Fróðskaparsetrið eigur sjálvt, og í samstarvi við Fróðskaparfelagið, at geva út rit og bøkur við evni úr føroyskari mentan.

Tórshavn 1. juni 1985

Føroyamálsdeildin

Uppskot um skipan í deildir:

Fróðskaparsetur Føroya

Setursráð

(collegium academicum el. konsistorium)

Rektari

Meginddeild (fakultet) fyri serføroysk evni

Serdeildir (institut):

Norrøn frøði (filologi)

Málvísindi (lingvistik)

Orðabókafrøði (leksikografi)

Fólkaminnisfrøði

Bókmentafrøði

Fornfrøði

Søgufrøði

Fólkalívsfrøði (etnologi)

Meginddeild fyri almenn evni

Serdeildir:

Gudfrøði (teologi)

Løgfrøði (jura)

Samfelagsfrøði (sociologi)

Havfrøði (oceanografi)

Fiskifrøði (marinbiologi)

Náttúrufrøði

Tónlistarfrøði

Fróðskaparsetur Føroya

Fylgiskjal 3.
4 bls.

Uppskot til:

Námsætlan fyri »høvuðsgrein í Norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum«

Almenn lýsing

Høvuðsgreinin er eitt framhald av loknum exam.art prógvi í norðurlendskum máli og bókmentum, helst við góðum úrsliti. Í støddd og dýpd verður greinin miðað eftir samsvarandi akademiskum lestri í móðurmálinum til skúlaembætisprógv við lærdar háskúlar í Norðurlondum og varir vanliga 4 lestrarhálvur. Námið fevnir um triggar tættir: **A.** Høvuðsritgerð sum er ein vísindalig kanning av einum sjálvvaldum námsevni, **B.** Felagslestur í vísindaástøði, granskingarsøgu og samfelagskunnleika kring mál og bókmentir, **C.** Serlestur í máli og bókmentum sum er samansettur av 3 evnisbólkum.

A. Høvuðsritgerð

Studenturin skal granska eitt námsevni og skriva eina ritgerð um arbeiðið. Ritgerðin kann skifta nakað til longdar eftir evni og viðgerð, men vanlig longd er umleið 100 maskinskrivaðar síður við dupultari reglurúmd.

Studenturin skal sjálvur velja ritgerðarevnið, men tað skal góðkennast av deildini. Evni, ið studenturin hevur viðgjørt í serritgerð síni til exam. art. prógv, verður vanliga ikki góðkent sum høvuðsritgerðarevni. Undir arbeiðinum við ritgerðini skal studenturin hava ein leiðbeinara, sum eisini hevur ábyrgd av, at evnið verður lagt fyri deildina til góðkenningar. Vanliga skal ein av lærarunum á deildini virka sum leiðbeinari, men í stakføri kann deildin eisini góðkenna annað serkønt fólk sum leiðbeinara.

Studenturin kann annaðhvørt gera avtalu um leiðbeining heimleiðis við sergreinaralærara, ella kann hann venda sær til deildina, sum skal hjálpa honum at fáa í lag eina slíka skipan. Deildin hevur eisini høvi at seta ein leiðbeinara til studentin.

Studenturin eigur tíðliga í lestrinum at kunna seg um evnið, sum hann ætlar at velja til høvuðsritgerðina. So skjótt sum evnið er honum greitt, eigur hann at lata tað innskriva á deildarskrivstovuni. Eisini skal innskrivast, hvør ið er leiðbeinari.

Høvuðsritgerðin, sum telur 50 % av prógvtalinum í skrivligu prógvtøkuni, skipar ein høvðussess í náminum og eigur at sýna, at studenturin hevur gávur til

sjálvstøðugt, gangmetandi og háttbundið arbeiði, og at hann megnar tað framsetingar- og skjalsanningarlag, ið høvir evninum. Studentur og leiðbeinari mega í felag siggja til, at studentinum er møguligt at fullgera ritgerðina eftir tveimum lestrarhálvum.

Høvuðsritgerðin verður innlatin í 3 eintøkum innan ásetta tíðarfreist, sum verður kunngjørd (sí seinni). Stuttur samandráttur av innihaldinum (1-2 bls.) skal vera aftast í ritgerðini. Í honum skulu hesar upplýsingar standa:

1. Navn á høvundi og ritgerðarheiti.
2. Stutt evnislýsing.
3. Tað tilfar, ið ritgerðin byggir á (frumtilfar og møguliga týdningarmestu cykaheimildir
4. Spurdómar og háttalag.
5. Evnisskipan.
6. Niðurløga ella úrslit.

Høvuðsritgerðin verður mett av leiðbeinara saman við prógvnevndini.

B. Felagslestur

§ *56.* Kunngerðir við heimild í lógarinnar § 12, § 16, § 20, § 21, § 23, § 29, § 30, § 31, § 33, § 34, 2. stk., § 35, 2. stk., § 44, 4. stk., 1. pkt. og § 50, 2. stk., 3. pkt. kunnu áseta, at kunngerðir fyriskipaðar ávísandi til donsku apotekara- og heilivágslógirnar verða settar í gildi í Føroyum við broytingum ella uttan.

§ *56.* Bekendtgørelser med hjemmel i lovens § 12, § 16, § 20, § 21, § 23, § 29, § 30, § 31, § 33, § 34, stk. 2, § 35, stk. 2, § 44, stk. 4, 1. pkt., og § 50, stk. 2, 3. pkt., kan fastsætte, at bekendtgørelser udstedt i.h.t. de danske apoteker- og lægemiddellove sættes i kraft på Færøerne med eller uden ændringer.

§ *57.* Til skrásetingarráðið hevur stovnsett ta tilbúningaskrá, ið nevnd er í § 38, 2. stk. er tað loyvt í Føroyum at handla við farmaceutiskum tilbúningum, sum eru upptikin í tilbúningarskránni hjá danska heilsustýrinum.

2. stk. Landsstýrið ásetir við kunngerð, nær tann tilbúningaskrá, ið er førd av skrásetingarráðnum, skal verða stovnsett.

§ *58.* Tann, sum tá lógin kemur í gildi, er settur sum landsapotekari ella apotekari, kann hóast ásetingarnar í § 5, 1. stk., og § 6 velja at varðveita starvsetingarháttin higartil, uttan so at viðkomandi við skrivligari fráboðan, sum skal vera landsstýrinum í hendi innan 1. januar 1989 sigur frá, at hann ynskir at verða settur tænastumaður. Við tílíkt skifti til tænastumannaseting verða almennu reglurnar í tænastumannalógini um eftirlønarrætt nýttar.

§ *57.* Indtil registreringsnævnet har oprettet i § 38, stk. 2, omhandlede specialitetsregister, det tilladt på Færøerne at forhandle farmaceutiske specialiter, er optaget i Sundhedsstyrelsens specialitetsregister.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse tidspunktet for, hvornår det af registreringsnævnet førte specialitetsregister er oprettet.

§ *58.* Den, som ved lovens ikrafttræden er ansat som landsapotekar eller apoteker, besvarer uanset bestemmelserne i § 5, stk. 1, og 6 den nuværende ansættelsesform, medmindre vedkommende ved en skriftlig erklæring, som skal være landsstyret i hænde inden 1. januar 1989, meddeler at ville overgå til ansættelse som tjenestemand. Ved en sådan overgang til tjenestemandsansættelse finder tjenestemandslovgivningens almindelige regler om erhvervelsen af pensionsret anvendelse.

1. Almennar viðmerkingar

1.1. Søguligt yvirlit o.a.m.

Lóggáva um apoteksviðurskifti og heilivág snýr seg um at tryggja landsins tørv á munagóðum heilivági fyri rímiligar prísir. Í Norðurlondum hevur henda siðvenja fleiri hundrað ár á baki, men eitt nú Ísland og Føroyar fingu nakað seint skipað apoteksviðurskifti, og í Grønlandi er einki apotek, sum vit kenna tað um okkara leiðir.

Mál um apotek í Føroyum varð fyrstu ferð reist o.u. 1840, men ikki fyrr enn 1883 varð apotek sett á stovn í Tórshavn sum deild av einum donskum apoteki. Í 1898 varð apotekarin á hesum apoteki leysur av sáttmálanum við danska apotekið, og søkti um og fekk loyvi frá donsku myndugleikunum at halda fram at reka apotekið fyri egna rokning. Apotekarin í Føroyum var ikki vardur av lóggávu um sølu av heilivági sum einarætt hansara. Bert vanligt handilsloyvi og farmaseutisk útbúgving kravdist á fyri at handfara og reka handil við heili-

vági í Føroyum. Handilsligir teupulleikar, fyrst í apotekarin kom í, aftan á at eitt annað apotek varð sett á stovn í Havn gjordi, at Lov nr. 121 af 29. april 1913 «Om apotekervæsenet på Færøerne», aftaná 4 ára viðgerð varð samtykt og sett í gildi í fyri Føroyar.

1. 2. Løggáva í Danmark, Íslandi, Finnlandi, Noregi og Svøríki.

Av norðurlondum hevur bert Svøríki yvirtikið raksturin av apotekunum og stovnað partafelag, Apoteksbolaget, sum svenska ríkið eigur. Apoteksbolaget rekur svensku apotekini. Hetta líkist mest føroysku viðurskiftunum í dag á hesum øki.

Í hinum Norðurlondum er raksturin av apotekunum ikki frí vinna, men liggi arliga ábyrgdin er hjá tí einstaka loyvishavaranum, sum loyvi hevur fingið frá ríkinum at reka apotek undir ávísum treytum, sum eru rættiliga líkar í Norðurlondum.

Løggáva um handil o.a.m. við heilivági í Norðurlondum verður í «Nordisk lokkemiddelnevn» undir norðurlandaráðnum, roynd tillagað soleiðis, at munurin so við og við verður til minsta bága fyri norðurlendskt samstarv á hesum øki. Hetta arbeiði hevur nevndin kunnað seg um, og leggjast skal aftur at, at londini Ísland, Noregi, Svøríki, Danmark og Finnland síðan 1971 hava verið bundin av millumlandasáttmála, »Konvention om gensidig anerkendelse af inspektioner af virksomheder, der fremstiller lægemidler (med forklarende bemærkninger) af 9. september 1971«, sum áleggur limalondunum ávísar skyldur viðvíkjandi framleiðslu og sølu av heilivági.

Hesin sáttmáli er ikki lýstur at galda fyri Føroyar, men eiga stig at verða tikin til hetta í sambandi við, at løgin kemur í gildi, sí viðmerkingarnar til § 52.

1. 3. Galdandi løggáva.

Í 1932 verður nýggj apotekaralóg sett í gildi í Danmark og varð hendan lóg í tillagaðum líki sett í gildi sum »Kgl. anordning« nr. 272 frá 22. september 1937 «om apotekervæsenet på Færøerne». Hesin hevur formligan løgagildi enn, men nógv ár eru gingin, so endurskoðan hevur leingi verið fyri neyðini. Við løgtingslóg nr. 14 frá 28. mars 1949 um apotek, sbrt. § 2 og lista A, pkt. 4 í heimastýrislógini og løgtingslóg nr. 63 frá 15. desember 1949 um apotekaragrunn er apoteksverkið yvirtikið sum sermál.

Nevnda »anordning« 272 frá 1937 verður framvegis í gildi og hevur tydning fyri tey øki, sum einki er ásett um í løgtingslógini nr. 14/1949 um apotek og 63/1949 um apotekaragrunn. Apoteksverkið verður almennur stovnur og landsapotekarin settur sum stovnsfyristøðumaður.

1. 4. Arbeiðsbilkarin.
Tann ráðleggingarnevnd fyri apoteksverkið, sum við skrivi 17. juli 1978 varð skipað við landsstýrissamtykt og broytt við skrivi 19. september 1984, hevur m.a. sum setning at endurskoða lóggávuna og koma við uppskoti hesum viðvíkjandi. Landsapotekarin er formaður í nevndini og hevur sambært samtykt 3. mai 1984 nú eftirlitið við apotekunum.

Í ráðleggingarnevndini eru hesir limir:
Any Magnussen, deildarleiðari á apotekinum í Klaksvík,
Heri Mørkøre, deildarleiðari á apotekinum á Tvøroyri,
Hardy Madsen, deildarleiðari á apotekinum í Tórshavn,
Jákup Haraldsen, landsapotekari og
Sjúrður Rasmussen, fulltrúi, Føroya Landsstýri.

Nevndin hevur havt ymisk mál apoteksverkinum viðvíkjandi til viðgerðar og umnælis, og á hvørjum ári lagt figgjar- og íløguætlanina fyri apoteksverkið og gjørt tilmæli samsvarandi hesum. Hetta hevur verið eitt av høvuðsmálunum hjá nevndini umframt lógararbeiði, sum hevur staðið við millum aðrar uppgávur tey seinastu 4 árini.

2. Viðmerkingar til uppskotið.

Kap. I Almennar ásetingar um apoteksverkið.
Til § 1. Ásetingin kemur í staðin fyri § 1 í løgtingslóg nr. 14 um apotek frá 28. mars 1949 og § 1 í An. 272 frá 22. september 1937 »om apotekervæsenet på Færøerne«. Eftir hesum var møguleiki fyri at hava apotek á privatum hondum, men einki apotek hevur verið á privatum hondum í Føroyum síðan 1949. § 1 lógarfestir sostatt ta rættarstøðu, sum í dag í veruleikanum er galdandi, at apoteksvirksemi er á almennum hondum undir landsstýrinum. Ásetingin hevur tær avleiðingar, at landsstýrið kann geva landsapotekaranum, apotekarunum og starvsfólkunum á apotekunum tænastuboð, sum teir hava skyldu at akta.

Í tann mun, tær reglurnar, sum eru galdandi fyri apoteksverkið, eisini skulu vera bindandi fyri persónar og stovnar uttan fyri apoteksverkið, gevur ásetingin sjálvsagt ikki neyðuga heimild. Apoteksverkið er landsapotekaraembætið, apotekini, handkeypssølurnar og sølur, sum verða riknar av apoteksverkinum.

Landsapotekaraembætið er nærri útgreint í § 5.

Apotek er ein skipanarliga sjálvstøðug eind, sum kann selja og framleiða heilivág o.a. í tann mun, ásett er í hesi lóg. Handkeypssølurnar eru sølur, sum keypa vørurnar frá ávísum apoteki, og verða ikki riknar av apotekinum. Vanliga verða tær hýstar hjá keypmonnum, sum fáa avslátt, tá ið teir keypa frá apoteki. Sølur, sum riknar verða av apoteksverkinum, kunnu hugsast í framtíðini, t.d. eitt millumstig millum apotek og handkeypssølu.

Til § 2, 1. og 2. stk.: Innihaldsliga hava líkar greinir ikki verið í gildi í Føroyum fyrr. Fyrimyndin er § 2, 1. og 2. stk. í »Lov nr. 279 af 6. juni 1984 om apotekervirksomhed«.
Til § 2, 3. stk.: 3. stk. heldur fram galdandi rættarstøðu, sum er ásett í § 11, 1. stk., í »An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne« og samsvarar við § 2, 3. stk., í »Lov nr. 279/1984 om apotekervirksomhed«.
Til § 3: Greinin heldur fram galdandi rættarstøðu eftir løgtingslóg um apotek frá 1949 § 1 um, at tað er landsstýrið, sum ger av, um nýtt apotek skal verða stovnsett. Harafturat leggur greinin eisini upp fyri, at tað kann koma fyri, at apotek skuln verða niðurløgd ella flutt.

Fyrimyndin fyri ásetingini er § 4, 1. stk., í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«. Ásetingin ber í sær, at landsstýrið ger av talið á apotekunum og hvar tey skulu vera. Tá tílík mál verða viðgjørd, er tað ein fyrimunur, at landsstýrið fær sær til vegar ummæli frá landsapotekaranum, apotekunum, landslæknanum og avvarðandi bygdarráðum og kommunulæknum. Ein fyritreyt fyri avgerð sambært ásetingini er, at neyðug játtan er tøk.
Til § 4: § 4 er átøk § 3, í An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne og er sama regla eisini ásett í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed« § 3, 1. stk.

Kap. II Starvsfólk.
Til § 5, 1. stk.: Vanligt, er at fyristøðumenn fyri landsstovnum er tænastumenn, tí tað er náttúrligt at teir hava ábyrgd fyri landinum, og er tað eisini galdandi í hesum føri. Fyri tann músetta landsapotekaran er tó ein serlig skiftisregla í § 58. Viðvíkjandi starvssetingarháttinum verður vist til viðmerkingarnar til § 6.
Til § 5, 2. stk.: Landsapotekarin hevur higartil virkað sambært landsstýrissamtykt viðvíkjandi apoteksverkinum frá 15. september 1983 og hevur sum høvuðsuppgávu at umsita almenn mál viðvíkjandi apoteksverkinum, hava tað farmaseutiska eftirlitið við apotekunum og umboða apoteksverkið úteftir.
Til § 6: Apotekarar skulu verða settir, ein á hvørjum apoteki. Starvini verða at lýsa leys alment og verður vanliga mannagongdin undan starvsseting, at landsstýrið fær sær til vega ummæli frá landslæknanum, landsapotekaranum og hinum apotekarunum. Sama er galdandi fyri apotekarar sum landsapotekaran viðvíkjandi tænastumannaseting.
Til § 7: Galdandi krøv til apotekarar eru sett í løgtingslóg um apotek frá 1949 § 2 og »An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne« § 1 og 2.

Fyrimyndin fyri ásetingini er § 15 í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«. Í mun til krøvini í galdandi lógar fyri at gerast apotekari eru broytingarnar:

a) Kravið í núverandi lógini um aldur millum 25 og 50 verður slept.

b) »Avvarðandi skal umframt ávisa, at hann hevur ræði á búgvi sínum« er skotið upp verður broytt til »ikki vera á húsagangi«. Broytingin er ein avleiðing av ásetingunum í lóg nr. 298 frá 8. juni 1977 um húsagang, sum løgtingið hevur samtykt at mæla ríkisstýrinum at seta í gildi í Føroyum.
Eingin verulig broyting er ætlað.

c) Skotið er upp, at danskt farmaseutiskt kandidatprógv verður kravt ella annað prógv, sum er javnsett við hetta, og sum lýkur treytir í altjóðasáttmála. Um so er, at »overenskomst af 25. august 1981 mellem Danmark, Finland, Norge og Sverige om godkendelse af erhvervsudøvelse for visse personalegrupper inden for sundhedsvæsenet og veterinærvæsenet« verður lýst ment galda í Føroyum, kunnu farmaseutar úr øðrum Norðurlondum lúka hesar treytir.

d) Reglan í galdandi lóggávu um, at undirskrivast skal váttan um, at viðkomandi vil halda seg til tað, sum hann er skyldugur til, gongur út, tí hon er uttan rættarligt innihald.

e) Til § 7, stk. 1 nr. 5 er at viðmerkja, at við hesum verður miðað ímóti nágreiniligari at áseta, at arbeiðið, viðkomandi hevur verið í áðrenn, skal vera av týdningi sum apoteksleiðari, og at tílíkir førleikar eisini kunnu fáast á annan hátt enn við at verða settur á apoteki.

Til § 7, 2. stk.: Reglan ger tað møguligt fyrisitingarliga at kunna áseta reglur um størri kunnleikakrøv til apotekaran. Serliga verður hugsað um, at útbúgvingarskipanin verður broytt.
Til § 8: Ásetingin er nýggj og hevur sína fyrimynd í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«, § 24.
Til § 9: Innihaldið í ásetingini er nýtt og fyrimyndin § 25 í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«.
Til § 10: Henda áseting merkir, at onnur revsitiltøk, enn at loysa úr starvi, kunnu fremjast eftir reglunum í lóg um tænastumenn landsins.
Til § 11, 1. stk.: Fyrimyndin er »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed« § 31, 1. stk.

Av reglunum, at apotekarin stendur fyri rakstrinum av apotekinum, stendst, at apotekarin setir starvsfólkið, eisini farmaseutarnar. Starvini skulu lýsast leys. Higartil hevur tað verið so, at landsstýrið setir farmaseutarnar, bókhaldara og kassameistara við apoteksverkið.

Skyldan hjá apotekaranum til at bera so í hand, at apoteksvirksemið fer tryggiliga fram og í samstarvi við galdandi reglur, verður nú nevnd beinleiðis í lóggávuni. Apoteksvirksemi skal fremjast soleiðis, at bæði trygdin við arbeiðinum við heilivági verður sett í háseti og at eitt rímiligt tænastustig

verður hildið. Apotekarin hevur m.a. skyldu til, at bera so í lond, at á apotekinum er sett starvsfólk, sum er høskandi í tali og tilbúgving í mun til arbeiði á viðkomandi apoteki.

Til § 11, 2. stk.: Fyrimyndin er § 31, 2. stk., í »Lov nr. 279/1984«. Skyldan at stýra apoteki, ber í sær eisini, at ein trygg fyristøða er undir fráveru. Við tryggari fyristøðu er at skilja persón, sum hevur innlit í oll viðurskifti rakstrinum viðvíkjandi, og skal hesin persónur hava í minsta lagi prógv sum apoteksassistentur.

Til § 11, 3. stk.: Greinin er sett inn, til tess at landsapotekarin sum oftirlit kann kunna seg um, hvussu standurin er.

Til § 12: Í seinasta og næstseinasta pkt. í § 2 í løgtingslóg 14/1949 um apotek eru stuttar reglur ásettar um heimildir og nøvn á starvsbólkunum á apotekunum. Reglan hevur tó verið tann, at í royndum hava danskar reglur verið nýttar í javndømis á hesum øki. Tað skerst ikki burtur, at vit á hesum øki hava lagað okkum til donsku útbúgvingarskipanina, og verður tí í § 12, veitt landsstýrinum heimild til at áseta heimildir og reglur um útbúgving og starvsheiti á apoteksstarvsfólki. Tá útbúgvingarsamstarvið er nøvnt við Danmark, verður hetta helst gjørt við ávísing til tær donsku reglurnar. Fyrimyndin fyri § 12 er § 34 í »L 279/1984 om apoteksvirksomhed«.

Til § 13: Fyrimynd er § 35, í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«.

Til § 14: Fyrimyndin er § 36, í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«.

Til § 15: Fyrimyndin er § 37, í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«.

Kap. III Innretting og rakstur av apotekum.

Til § 16: § 16 kemur í staðin fyri § 11, 2. stk. í »An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne«, har ásett er, at reglurnar um innretting og rakstur eru tær sama í Danmark og í Føroyum.

§ 16 verður eingin verulig broyting av hesi rættarstøðu, tí í støran mun verður farið eftir teim donsku reglunum á hesum øki. Tað kann tó vera, at neyðugt er, at serligar føroyskar reglur verða, eitt nú tí Danmark gev reglur treytaðar av EF samarbeiðinum.

§ 16 hevur sína fyrimynd í § 38 í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«.

Til § 17: Ásetingin kemur í staðin fyri § 11, 3. stk. í »An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne og tá verkligu meginreglu, at landsstýrið hevur góðkent avgreiðslutíðina. Eftir hesum verður hendan heimildin latin landsapotekaranum.

Til § 18: Fyrimyndin fyri ásetingina er § 41 í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«. Hendan reglan er í norðurlanda lóggávu um apotek og verður mett at vera ein avleiðing av tí einaretti, apotekini hava.

Til § 19: Greinin loysir av § 17 í »An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne«. Vanligt er í dag, at apotek selja aðra vøru enn heilivág. Umleið 20 %

av søluni frá apotekunum eru eitt nú vørur til vanliga sjúkrarøkt, sum aðrir handlar eisini hava loyvi at selja, men sum siðvenja er, at bert apotek hava á goymslu til sølu. Eisini hava apotek til sølu eitt nú sonevndar náttúruheilivágtilbúningar, ymisk sløg av vitamintilbúningum, vørur til húðrøkt, sum fyri eitt part verða framleidd á apotekunum (COSMEA) o.s.fr.

Í 2. stk. verður mett, at landsstýrið fær heimild at áleggja apotekum at hava ávísar vørur á goymslu, sum eru ikki beinleiðis heilivágur, tá ið eitt nú ynskir um hetta koma frá heilsuligum stovnum.

Til § 20: Ásetingin kemur í staðin fyri § 23 í »An 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne«. Fyrimyndin er § 42 í »Lov nr. 279/1984 om apoteksvirksomhed«.

Til § 21: Greinin kemur í staðin fyri § 24 í »An 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne«. Henda grein hevur tó ikki verið hildin seinastu árini, men hevur landsstýrið ásett, hvør taksturin skal vera seinastu nógvu árini.

Landsapotekarin og apotekararnir leggja á hvørjum ári fíggjarætlan fyri apoteksverkið og gera viðmerkingar til landsstýrið um roknskapin fyri farna rakstrarárið. Tá verða eisini mál um inntøkur apotekanna viðgjørd og tilmæli um endurskoðan av útrokning av søluprísi lagt fyri landsstýrið.

Landsstýrið kann eisini áseta avslátt í takstinum við heimild í § 21. Apotekini lata tilsamans (1985) stívar 1 mió. kr. í avslátti til sjúkrakassar, sjúkrahús, heilivágveitandi læknar (bygdalæknar), djóralæknar og handkeypssølur.

Ikki er loyvt at víkja frá tí søluprísi, sum ásettur er í takstinum.

Kap. IV Handkeypssølur, sjúkrahús, heilivágveitandi læknar og djóralæknar.

Til § 22: Slík mál hava higartil verið avgreidd í landsstýrinum samsvarandi § 4 í løgtingslóg 14/1949 um apotek. Landsapotekarin eigur at umsíta málið eftir teimum reglum, sum higartil hava verið galdandi, soleiðis at bygdarráðið, kommunulæknar og landslæknin eisini fáa høvi til — at ummæla.

Til § 23: Er um heilivág á sjúkrahúsum og tílíkum stovnum. Apotekini hava eftirlit við goymslunum á hesum stovnum sum tænastuveiting umleið eina ferð um árið. Í tann mun tørvur er á, eigur landsstýrið at fáa heimild at áseta reglur hesum viðvíkjandi, og verður hetta at gera í samstarvi við avvarðandi stovn og tað apotekið, sum letur heilivágin til stovnin. Reglurnar eiga at samsvara reglunum í Norðurlondum. Heilivágurin skal keypast á føroyskum apoteki.

Til § 24: Kemur í staðin fyri § 20 í »An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne«. Apotekið hevur eftir § 32 einarætt at útflýggja heilivág. Tí verður neyðugt at lógarfesta hetta virksemi hjá kommunulæknunum og djóralæknunum. Her verður bert hugsað um læknar og djóralæknar, úti um landið, har eingi apotek eru, og eru hetta allir kommunulæknar og djóralæknar, sum starvast ítøkiliga uttan fyri Tórshavn, Klaksvík og Tvøroyri. Heilivágurin skal verða keyptur á apotekinum í avmáldum, prísmerktum eindum og skal útflýggjast til sjúkling ella avvarðandi viðgerara av dýri móti gjaldi, frá hekna ella djóralækna.

Fer læknin ella djóralæknin útum § 24, 1. stk., kemur hetta undir forboðið í § 32.

Kap. V Fíggjarviðurskifti.
Til § 25: 1. stk. er so at skilja, at apoteksverkið er sjálvfíggjandi, og er landsapotekarin og apotek við møguligum deildum fíggjað av rakstrarávoptinum í apotekunum.
2. stk. er lógarfesting av, at landsapotekarin og hvørt av apotekunum skulu hava rokniskap sær.
3. stk. er lógarfesting av galdandi reglum í landsstýrissamtykt [9. apríl] 1983 um apoteksverkið, har ásett er, at landsapotekarin og apotekararnir skulu leggja fíggjaráætlan og tilmæli til landsstýrið hesum viðvíkjandi í felag.

Fíggjaruppkastið fevnir um rakstrarinntøkur og útreiðslur og roknast hjá apotekunum og landsapotekaranum. Í fíggjaruppkastinum eru inntøkur og útreiðslur hjá apotekaragrunninum.

Kap. VI Apoteksgrunnurin.
Til §§ 26 og 27: Apoteksgrunnurin er lagdeingið hjá apoteksverkinum. Nevndin hevur hildið tað verða rættast at taka løgtingslóg nr. 63 um apotekaragrunnin frá 16. desember 1949 uppí hesa lóg um apoteksviðurskifti. Nevndin hevur skotið upp at seta afturat annars ikki broyttum lógartekstí, at grunnurin hevur til endamáls at fíggja apoteksverkið. § 27 svarar til § 3 í niverandi lóg um apotekaragrunn.

Kap. VII Heilivágsøkið.
Til §§ 28, 29 og 30: Galdandi rættarskipan viðvíkjandi heilivági er »Anordning 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne«. Eftir hesum er heilivágur at skilja sum tey evni og tilbúningar, sum eru í galdandi eldri donsku farmakopéum, forskriftarsøvnum, læknavísindaligum bókatilfari o.a.t.

Hugtakið heilivágur er ikki lýst í »An. 272/1937«. Fyrimyndin til §§ 28, 29 og 30 er eftir §§ 1, 2 og 3 í »lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler«, og er komið í danska og norðurlendska lóggávu til tess at avmarka hugtakið heilivágur og at gera hetta lagaligt at umsita. Soleiðis er í § 29 heimild til hjá landsstýrinum at lata lógina heilt ella lutvist fevna um vørur, sum ikki beinleiðis koma undir økið heilivágur, sum tað er lýst í § 28 og í § 30, og at fevna um vørur, sum eru ikki undir ásetanini á lógini og at heimila landsstýrinum at áseta reglur um frávik frá lógini.

Hetta merkir, at landsstýrið kann taka upp stakmál viðvíkjandi heilivági og gera reglur teimum viðvíkjandi. Hetta er ikki møguligt eftir galdandi rættarstøðu. Mál av hesum slagi eru komin fyri hesi seinastu árini, men fyrisitingin hevur einki kunnað gjørt við tey vegna heimildarloysi.

Kap. VIII Almennar ásetingar um heilivág.

Til § 31: Rættarstøðan í dag er, at Norðurlanda farmacopoein er lýst at galda í Føroyum. Norðurlanda farmacopein er í Norðurlondum avloyst av europisku farmacopooini, sum er galdandi eisini fyri hini europisku londini. Siðvenja her er, at føroyska apoteksverkið hevur nýtt donsku reglurnar, sum lýstar hava verið um góðsku av heilivági, men formliga vantar ein kunngerð um, at European Pharmacopoeia og Danske Lægemiddelstandarder er í gildi í Føroyum.

Til § 32: Mett verður, at apoteksverkið skal hava einaratt til framleiðslu, innflyting, goymslu, útflýgging, handil við og pakking av heilivági. Støðan í dag er, at eitt nú Føroya Búnaðarfelag og ein privatpersónur hava loyvi frá landsstýrinum at reka handil við ávísum heilivági til dýr. Hetta verður mett ikki vera nóg trygd fyri nýtaran, tí hesir nevndu loyvishavarar hava ikki serkunnleika til handfaring av heilivági.

Til § 33: Heimild er eftir hesi grein at áseta nærri reglur um m.a. eftirlit, goymslu og framferðarháttin, tá ið heilivágur verður framleiddur. Eisini kunnu somu reglur setast um aðrar vørur á apotekunum.

Til § 34: Hetta kann tykjast nakað hugsað, men hinvegin verður mett, at tað ikki er heppið at forða fyri tí møguleika at seta verksmiðju á stovn, sum kann framleiða heilivág til útflutnings og til sølu til apoteksverkið.

Til § 35, 1. stk.: Hetta er ein náttúrlig upplýsingarskylda og er einsljóðandi við § 6, 1. stk., í »Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler«.

Til § 35, 2. og 3. stk.: Fyrimyndin er »Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler« § 6, 2. og 3. stk.

Til § 36: Mett verður at tann framleiðsla, sum enn er á apotekunum, nøkur ár heldur fram, og tá koma vit í ta støðu, at neyðugt er at navngeva føroyskan heilivág, um hildið skal verða fram við framleiðslu her á landi.

Til § 37: Fyrimyndin er § 7 í »Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler«.

Kap. IX Farmaseutiskar tilbúningar.

Til § 38, 1. og 2. stk.: Fyrimyndin er §§ 11, 1. stk., og 13, 1. stk., í »Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler«. Rættarstøðan viðvíkjandi sølu av farmaseutiskum tilbúningum er §§ 16 og 28 í An. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne. Danska skráin av farmaseutiskum tilbúningum er framliga ikki lýst at galda í Føroyum, men hevur landsstýrið við samtykt 25. oktober 1985 álagt apotekunum at nýta galdandi »specialitetstakst«, sum er skrá yvir farmaseutiskar tilbúningar við prísáseting.

Somuleiðis verða donsku reglurnar um útflýgging av heilivági nýttar og er hetta eisini álagt apotekunum við landstýrissamtykt frá 3. mai 1984.

Til § 38, 3. stk.: Fyrimyndin er § 13, 2. stk., í »Lovbekendtgørelse nr. 151 1982 om lægemidler«. Tað kemur fyri, at sjúklingur er viðgjørdur uttanlands við ikki

skrásettum tilbúningi og viðgerðin skal halda fram í Føroyum, ella sjúklingur, sum hevur forskrift til ikki her skrásettan heilivág, sum fæst í øðrum Norðurlandi. Vanliga verður lækni her tá eftirspurdur.

Til § 39, 1. stk.: Skrásetingarráðið skal mannast við serlæknum og hava farmaseutiska skrivarahjálp. Nevndin skal avgera mál viðvíkjandi skráseting av farmaseutiskum tilbúningum.

Til § 39, 3. stk.: Skilað verður her til, hvør dentur skal leggjast á, áðrenn stoða verður tikin til skráseting av tilbúningi. Nevndin metir tað vera umráðandi, at dentur verður lagdur á, at tørvur á farmaseutiskum tilbúningi skal vera ein grundgeving fyri góðkenning til skráseting.

Til § 40: Hetta er ein avleiðing av millumlandasáttmála um sínámillum eftirlit av virkjum, sum framleiðn heilivág. Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 52 og almennu viðmerkingarnar 1.2.

Til § 41: Áseting hevur sína fyrimynd í donsku »Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler« § 20, 1. stk. Greinin fevnir bert um tey føri, har ið avskráseting fer fram uttan umsókn frá framleiðara ella innflytara. Annars kann skrásetingarráðið eina og hvørja tíð, taka av skráseting av tilbúningi eftir áheitan frá framleiðaranum ella innflytaranum.

Til § 42: Vitan um farmaseutiskar tilbúningar fæst í almennum handbókum o.t. og í tilfari um tilbúningin, sum framleiðari hevur, og fegin letur frá sær. Fyrispurningar til skrásetingarráðið fara helst at snúgva seg um nýliga skrásettar tilbúningar, sum enn eru ikki at finna í handbókum o.t.

Kap. X Heilsubóttarlig rannsókn. Sala ella útflýgging av heilivági til serstøk endamál.

Til §§ 43 og 44: Fyrimyndin fyri hesum reglur er kap. 5 §§ 24 og 25 í »Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler«, sum broytt við lóg nr. 157 frá 11. apríl 1984.

Kap. XI Lýsing um heilivág.

Til §§ 45 — 50: Reglurnar koma í staðin fyri § 29 í »An. nr. 272/1937 om apotekervæsenet på Færøerne«.

Tær hava sína fyrimynd í kap. 6 í »Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler«, sum broytt við lóg nr. 157 frá 11. apríl 1984.

Kap. XII Áseting um eftirlit o.a.m.

Til § 51: Av tí at nógvar av reglunum, sum ásetast skulu við heimild í lógini og avgerðir, sum skulu takast, eru av ógvuliga tekniskum slagi, verður mett rætt,

at heimild er at leggja avgerðarrættin og heimildirnar at skriva út fyriskipanir til landsapotekaran. Tá landsapotekarin lýsir kunngerðir, fer tað fram á vanliga hátt, t.e. við lýsing í Dimmalætting og seinni upptøku í Føroya kunngerðasavn.

Til § 52: Víst verður til almennar viðmerkingar 1. 2., har umtalaður er altjóða sáttmáli um sínámillum eftirlit av virkjum, sum framleiða heilivág. Ein avleiðing av hesum er, at farmaseutiskur tilbúningur, framleiddur í landi, sum hevur skrivað undir nevnda sáttmála, kann roknast at standa tey krøv til dygd o.a.m., sum sáttmálin krevur.

Til § 53: Ásetingin gevur landsapotekaranum eftirlitsheimildina. Siðvenja er, at eftirlit verður framt í minsta lagi eina ferð árliga.

Til § 54: Revsiásetanirnar eru ordaðar soleiðis, sum vanligt er at gera í nýggjum donskum lógum.

Til § 55: Orsakað av at kunngerðir skulu gerast, áðrenn lógin kann fara at virka, er neyðugt við skotbrái, áðrenn lógin fær gildi.

Lógin og kunngerðir frammanundan 1949 eru at kalla avoldaðar, tíðin er farin undan teimum.

Lógirnar eftir 1949 eru báðar tiknar upp í hesa lóg og verða tí avlýstar her.

Orsakað av at heimildarlógin er buturfallin, eru hesar kunngerðir burturfalnar:

Bek. nr. 649 af 13. december 1918 om håndkøbsudsalg på Færøerne,

Anordning nr. 79 af 4. april 1929 om apotekervarer,

Anordning nr. 272 af 22. september 1937 vedrørende apotekervæsenet på Færøerne, sum broytt við Anordning nr. 19. af 22. januar 1940,

Bek. nr. 28 af 6. juni 1941 (omhandlede apotekervarar),

Bek. nr. 17 af 15. august 1946 (for Færøerne om medicintakster),

Kunngerð nr. 33 frá 16. juli 1956 av reglugerð um apotek,

Kunngerð nr. 11 frá 9. apríl 1965 um nýggja pharmacopé.

Til § 56, 1. stk.: Talan er her um rúgvismikið tilfar av farmaseutiskum lækna frøðiligum slagi. Framleiðsla av heilivági er í dag skipað eftir altjóða viðurkendum reglum og eru undir sínámillum eftirliti landanna millum.

Mett verður, at umseting til føroyskt og beinleiðis kunngerð í fullum líki, fer at krevja óneyðuga nógva arbeiðsorku, tíð, pening, pappír o.a. tilfar, sæð í mun til tað lítla talið av fólki, reglurnar eru vandar til, sum eru settar yrkisbólkarnir innan heilsuverkið í Føroyum.

Til § 57: Virki skrásetingarráðsins við skráseting av farmaseutiskum tilbúningum kann í fyrsta lagi byrja, tá ið lógin kemur í gildi. Samstundis er tað sambært § 38, 2. stk. ikki loyvt at flyta inn, selja ella útflýggja farmaseutiskar tilbúningar. Ein umskiftisregla er tí neyðug. Ásetingin merkir, at galdandi skipan heldur fram, til føroyska skráin er gjørd. Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 38, 1. og 2. stk.

Til § 58: Tíl ikki at gera seg inn á starvssetingarháttin hjá landsapotekara og teimum apotekarum, sum settir eru, tá ið lógin fær gildi, er neyðugt við hesi umskiftisreglu. Siga teir ikki frá innan nevndu freist, verður starvsháttur in óbroyttur. Viðmerkt verður tó, at reglurnar í §§ 8-10 eru galdandi fyri hesar persónar undir øllum umstøðum, tá ið lógin fær gildi.

Skjal til løgtingsmál 120: Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving.

Álit

viðvíkjandi

Sjóvinnuskúla

í Føroyum

9. desember 1986

Inngangur:

Uppbygging av álitinum.

(Forsoga) Fyrireiking

Tann 26. augus 1985 setti landsskúlastjórin Ludvig Petersen eina nevnd at gera ymisk arbeiði í sambandi við sjómansútbúgvingar, herundir uppskot um sjóvinnuskúla í Føroyum.

Nevndin fekk í hesum sambandi heimild til at útvega sær arbeiðsbólkar til at gera álit um sjóvinnuskúlan.

Í nevndina komu hesi fólk:

Kaj P. Mortensen, formaður,
Sólja Michelsen,
Gunvør Hoydal og
Hans Jacob Lamhauge.

Nevndin samtykti á fundi tann 29. januar 1986 at velja 3 fólk, sum skuldu standa fyri arbeiðsbólkinum og hava fundir við vinnulívsumboð fyri at koma til eina niðurstøðu. Hesi vóru:

Kaj P. Mortensen, Helena D. á Neystabø
og Torfinn Hentze.

Tann 31. januar 1986 sendi nevndi skriv til hesi feløg og skúlar, sum vóru biðin um at velja eitt umboð í arbeiðsbólkin:

1. Føroya Skipara- og Navigatørfelag
2. Føroya Maskinmeistarafelag
3. Føroya Motorpassarafelag
4. Føroya Fiskimannafelag
5. Meginfelag Útróðramanna
6. Reiðarafelagið fyri Farmaskip
7. Føroya Reiðarafelag
8. Ráfiskakeyparafelagið
9. Føroya Sjómansskúli
10. Føroya Maskinskúli
11. Tekniski Skúlin í Klaksvík
12. Klaksvíkar Sjómanskúli

Av hesum sendu øll umboð undantikið Megintelag Útróðrarmanna og Ráfiskakeyparafelagið.

Sostatt hevur arbeiðsbólkurin verið soleiðis amansettur:

Jákup Müller	Umboð fyri	Før. Skipara- og Nav. fel.
Eli Davidsen	Umboð fyri	Maskinmeistarafelagið
Johan F. Jacobsen	Umboð fyri	Føroya Motorpassarafelag
Óli Jacobsen	Umboð fyri	Føroya Fiskimannafelag
Helgi Niclasen	Umboð fyri	Reiðaraf. f. Farmaskip
Arni Poulsen	Umboð fyri	Føroya Reiðarafelag
Hans J. Lamhauge	Umboð fyri	Føroya Sjómannsskúli
Páll Joensen	Umboð fyri	Føroya Maskinskúli
Poul Kristian Henriksen	Umboð fyri	Tekniska Sk. í Klaksvík
Álvur Zachariassen	Umboð fyri	Klaksvíkar Sjómannsskúli
Helena D. á Neystabø	Umboð fyri	Landsskúlafyrisitingina
Torfinn Hentze	Umboð fyri	Brandstøðina við Áir
Kaj P. Mortensen	Umboð fyri	Landsskúlafyrisitingina

Viðmerking.
Poul Kristian Henriksen er seinni avloystur av Fischer Hansen, meðan Andreas Højgård hevur luttikið sum varamaður fyri Óla Jacobsen. Fyri Jákup Müller hevur Mortan Johansen luttikið sum varamaður.

Arbeiðið í arbeiðsbólkinum

Sum frammanundan nevnt, er arbeiðsbólkurin skipaður við einum starvsbólki (3 limir) og einum umboðsbólki (13 limir).

Fundir
Í tíðarskeiðnum frá mars til november 1986 hava verið hildnir 7 fundir í starvsbólkinum og 4 fundir í umboðsbólkinum. Fyrsti fundur var 3. mars 1986.

Harumframt hava umboð fyri Landsskúlafyrisitingina verið til fundar við landsstýrið, eins og uppskot til fíggjarlóg 1986 er tikið við, soleiðis at skúlin fær møguleika at byrja frá 1. august 1986.

Kanningar av sjóvinnuskúlum í øðrum londum.
Í tann mun, har umboð fyri Landsskúlafyrisitingina og limir í arbeiðsbólkinum hava havt høvi til tess, hevur verið vitjað á hesum skúlum, eins og luttøka á fundum um sjóvinnuskúlaútbúgving er farin fram.

Kaj P. Mortensen:	»Fanø Søfarts- og havariskole«, 18. mars 1985 »Kogtved Søfartsskole«, 19. mars 1985 »Svendborg Søfartsskole«, 19. mars 1985 »Sjømannsskolen í Stockholm« herundir venjingarskipið »Polfors«, 22. mars 1985 Sjóvinnuskúli í Álandi, 7. mai. 1986.
Kaj P. Mortensen og Hans J. Lamhauge:	»Sønderborg Søfartsskole«, 4. september 1985 »Handelsflådens Kursuscenter« viðvíkjandi undirvísingartilfari, 5. september 1985 »Aspirantskipanin« hjá reiðarínum A.P. Møller, 6. september 1985.
Torfinn Hentze:	Kongress um sjóvinnuskúlar á »Fanø Søfarts- og havariskole« í døgunum 8.-10. juni 1986.

Úrslitið av hesum vitjanum og luttøkum saman við tí tilfari, sum er fingið til vega bæði undir vitjan og úr øðrum norðurlondum sum Finlandi, Noregi og Grønlandi, eins og spurningurin um undirvísingartilfar hevur verið arbeiðsbólkinum til stóra hjálp fyri at koma til hetta álit um sjóvinnuskúla í Føroyum.

Útbúgvingin á sjóvinnuskúla er ikki ein eftirlíknan frá øðrum londum, men ein útbúgving, sum eftir okkara viðurskiftum er hóskandi til okkara sjóføl k.

Tilmæli og støði frá øðrum álitum.
Við støði úr øðrum álitum, sum hava viðgjort sama evni, hevur arbeiðsbólkurin havt í huga:

1. Álit viðvíkjandi uppskoti um nýggja lóg um sjómansútbúgving 1984.
2. Álit viðvíkjandi fiskivinnuútbúgving frá september 1983.
3. Álit viðvíkjandi navigatørútbúgving, mars 1985.
4. Miðnámsútbúgvingar: Álit frá nevndini, sum hevur kannað útbúgving teirra 16-19 ára gomlu, oktober 1984.
5. Tilmæli um sjóvinnuskúla, sambært STCW, »Standards of Training, Certification and Watchkeeping« frá apríl 1984.

Nevndin undir pkt. 1 førdi í sínum áliti fram, at ein treyt fyri at fara á sjómansskúla skuldi verða, at næmingarnir hava tikið eitt fyrireikingarskeið, har nøgdug fyrireiking fæst innan farma- og fiskiskipaskið.

Harumframt var víst til pkt. 5, har øll norðurlond, undantikið Føroyar, settu hesa skipan í verk við gildi frá 26. apríl 1984.

Nevndin undir pkt. 2 visti eisini á tann vandandi forkunnleika, sum yvirmenn hava fyri at nøkta tey krøv, sum í dag verða sett yvirmonnum á fiskiskipum.

Álitið frá nevndini undir pkt. 3 tekur beinleiðis upp spurningin um sjóvinnuskúla sum eitt krav, og er lógartilfarið grundað á hetta álit, bygt soleiðis upp, at so skjótt sjóvinnuskúlin er stovnaður, so er hesin samstundis eitt krav til teirra, sum útbúgva seg til navigatør.

Við støði frá nevndini undir pkt. 3 er útbúgvingin ætlað sum eitt framhald av lærunni í fólkaskúlanum fyri tey 16-19 ára gomlu. Tó er eitt frávik, soleiðis at upptøkukravið á sjóvinnuskúla er 15 ár, og kemur hetta av sjómanslógini.

Tilmælið sambært pkt. 5 byggir á, at eitt og hvørt land, sum gongur undir treytirnar í STCW-samtyktini, skal skipa fyri grundútbúgving og upplæring samsvarandi hesari samtykt, sæð út frá einum trygdarsjónarmiði, samstundis sum upplæring fyri teir dekkarar/motormenn, sum ganga brúgva- og/ella maskinvakt, skal setast í verk.

Løgtingið viðtók hesa alheims-samtykt í september 1984.

Fundarsamtyktir og viðmerkingar frá arbeiðsbólkinum

Í sambandi við teir fundir, sum hava verið í arbeiðsbólkinum, hevur bólkurin samtykt at framja hesar høvuðsreglur, tilmæli og viðmerkingar.

1. Útbúgvingin á grundskeiðnum skal verða ein felags útbúgving, har eingin munur verður gjørdur á, hvat yrki ein velur sær á sjónum.

2. Skyldug skúlagongd úr fólkaskúlanum.

3. Skúlin verður skipaður sum ein kostskúli, har møguleiki verður at hava allar næmingarnar undir einum, samsvarandi tí umhvørvi, sum er umborð á skipi.

4. Aldursmark við upptøku verður 15-23 ár.

5. Lærugreinin landafrøði verður tikin við á hesum skúla innan almennar lærugreinir.

6. Grundskeiðið skal geva næmingi rætt til sertifikat í oldslokking samsvarandi altjóða krøvum.

7. Møguleiki at hava aðrar ískoytisútbúgvingar innan dekk, maskinu, kokkahústænastu ella fiskivinnu eigur at vera á sjóvinnuskúla.

8. Øll, sum fáa sær starv á sjónum, skulu luttaka í grundskeiði á sjóvinnuskúla, tó soleiðis, at í serligum føri verður møguleiki fyri fráviki. Umstøðurnar í tílíkum føri skulu viðgerast av serligum sjóvinnuráði.

9. Grundskeiðið skal vera 25 vikur. Teir næmingar, sum ætla sær undir annaðhvørt skipsføraraútbúgving ella skipsassistent-/motorpassaraútbúgving, eiga harumframt at hava verið á serligum yrkisskeiði í 10 vikur, tó soleiðis, at ein partur av tí krevdu dekks- ella maskintænastuni, í hesum føri 12 mánaðir, skal verða framt áðrenn upptøku á yrkisskeiðið.

Endamálið við yrkisútbúgvingunum er, at teir næmingar, sum fara undir skipsføraraútbúgving, fáa eitt hægri støddfrøðiligt og alisfrøðiligt støði, sum saman við læruni um trygd á sjónum ger, at hesir verða betri førir fyri at fara undir skipsføraraútbúgving. Fyri motorpassarar og skipsassistentar er endamálið, at hesir næmingar fáa betri kunnleika til nýtslu av amboðum sum eitt framhald av grundskeiðnum, og sum saman við læruni um trygd á sjónum ger hosar førar fyri at fara víðari annaðhvørt á skeið fyri motorpassarar ella í vinnu sum skipsassistentar. Á tímabýtisskipanini sæst, hvussu yrkisskeiðini eru býtt sundur.

10. **Krøv til lærarar á sjóvinnuskúla**
Lærarar á sjóvinnuskúla eiga at hava útbúgving sum skipsførarar ella maskinmeistarar (víðkað roynd) og skulu harumframt hava royndir á skipi. Harumframt eiga eisini at vera lærarar, ið av royndum hava serkunnleika innan tær ávísu lærugreinirnar sum t.d. fiskivinnu, reiðskap og almennar lærugreinir.

Lærarar eiga at vera egnaðir sambært endamálsgrein um sjóvinnuskúla og ganga heilt og fast inn fyri skipanini.
Stjórin, umsitingarleiðarin og allir lærarar eiga at fáa eina royndartíð við starvssetan, umframt at teir eiga at fáa hóskandi skeið um pedagogik (til dømis 3 mánaðir). Royndartíðin fyri stjóran skal vera 2 ár, meðan umsitingarleiðarin og aðrir lærarar fáa eina royndartíð, sum verður 1 ár.

Eftirútbúgving av lærarum eigur fyri ein part at fara fram í lunn háttur, at *ein lærari* alla tíðina er **uttan** fyri tímatalvu og við skipi hóskandi tíðarskeið.

11. **Reglugerðin**
Arbeiðsbólkurin samtykkir at seta reglugerðina í gildi fyri skúlan.

12. **Prógtøkan**
eigur at verða skipað soleiðis, at eingi minimumskrøv verða sett. Næmingarnir skulu til reynd og fáa prógv, hvar prógtøl eru við, sambært vanligum reglum. Nærri eigur at verðu ásett í lesiætlanini. Prógtøka verður bæði fyri grundskeið og yrkisskeið.

Tilmælir:

a) Arbeiðsbólkurin mælir harumframt til, at *skipsassistentskipanin* fær tilknýti til sjóvinnuskúla.

b) Tað skal vera eitt krav at nýta *yrkisbók* fyri øll arbeiðsøkir á skipi, sum kann siga frá, hvat ein hevur fingið frálæru í umborð (arbeiðsbókin). Henda bók skal førast umfram siglingarbókin, ið er kravd sambært sjómannslógina.

c) Mælt verður til, at fyri teir, sum ætla sær á verkstaðarskúla og maskinmeistaraútbúgving, eigur yrkisskeiðið møguliga at verða lagt sum beinleiðis framhald eftir grundskeiðið. Hetta verður ti bert galdandi í teimum førum, har ein er farin undir sjóvinnuskúla-útbúgving fyri seinni at fara á verkstaðarskúla, og ávirkar ikki núverandi skipan, har ein kann fara á verkstaðarskúla eftir 10. flokk. (sí uppskot um bygnað).

d) Mælt verður til, at tann tíðin á sjóvinnuskúla (grundskeið+yrkisskeið), har næmingarnir arbeiða beinleiðis á maskinverkstaði við dreygibonk og líknandi amboð, verður góðskrivað sum landpraktikkur eftir verkstaðarskúlan.

e) Viðvíkjandi *innihaldsriti* fyri hvørja einstaka lærugrein verður mælt til, at eitt yvirlit verður uppsett, tó soleiðis, at nærri verður ásett í lesiætlanum. Landsskúlafyrisitingin verður at áseta lesiætlanir.

Viðmerkingar

Í sambandi við hesar fundarsamtyktir hevur í arbeiðsbólkinum verið ført fram:

Tað eigur ikki at vera skilt millum fiskiskip og farma- ella ferðamannaskip, og skal hetta álit tí skiljast sum eitt felags álit fyri okkara vinnu á sjónum.

Arbeiðsbólkurin ásannar, at almennar lærugreinir eru neyðugar at hava við á sjóvinnuskúla.

Kravið um sjóvinnuskúla er longu komið við í kunngerð nr. 41 frá 29. mai 1985. Tess vegna fær skipanin gildi, beinanvegin skúlin er farin til verka.

Niðurstøða

Við støði í teimum álitum, fundarsamtyktum, viðmerkingum og tilmælum sum her nevnt, er arbeiðsbólkurin samdur um, at sjóvinnuskúli í Føroyum eigur at verða settur á stovn skjótast gjørligt fyri á tann hátt at tryggja teimum, sum fáa sær starv á sjónum, ein grundleggjandi yrkiskunnleika, umframt ástøðisligan kunnleika, sum ger at hesi verða før fyri at røkja tær arbeiðsuppgávur, sum krevjast á skipi. At geva teimum, sum ætla sær á hægri skúla innan sjóvinnu, eina ástøðisliga útbúgving sum ger, at hesi gerast før fyri at gjøgnumføra hesa útbúgvingar.

Ásannandi, at nútíðarumstøður umborð á skipi ikki geva møguleika fyri yrkisupplæring, og at væntandi kunnleiki um trygd og tey amboð, sum hertil hoyra, er ein veruleiki í dag, verður neyðugt at fremja hesi tiltøk á slíkum skúla, so at tey ungu her fáa ein ávísan forkunnleika til arbeiðið umborð umframt eina grundleggjandi upplæring um trygd á sjónum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at skúlin og frálæran verður soleiðis fyriskipað.

Uppskot um sjóvinnuskúla

1.

Starvsfólkaviðurskiftir

Við hvønn sjóvinnuskúla verður settur ein stjóri, ein »umsitingarleiðari« og neyðugt tal av lærarum.

Umsjónarfólk verða sett í tann mun, hetta er neyðugt.

2.

Leiðsla og læraraviðurskiftir

Skúlastjórin hevur dagligu leiðsluna um hendi og stendur Landsskúlafyrisitingini til svars fyri frálæruni.

Hann ansar eftir, at tann ásetta undirvisingarætlanin og aðrar fyriskipanir

fyri virksemi skúlans verða gjøgnumførdar á rættan hátt. Hann undirvísir sjálvur í tí vavi, sum er sambæriligt við hinar tænastuskyldur hansara.

Hann hevur ábyrgd av roknskapi og protokollum skúlans samsvarandi teimum fyriskipanum, sum Landsskúlafyrisitingin hevur sett.

Umsitingarleiðarin skal umframt at undirvísa hjálpa stjóranum í øllum viðurskiftum viðvíkjandi skúlans leiðslu. Hann er tiltaksmaður hjá stjóranum og virkar hansara vegna, tá stjórin ikki er til staðar.

Lærararnir standa í øllum, sum viðvíkur undirvísing og innaru skipan skúlans, beinleiðis undir stjóranum og eru skyldugir at leiða undirvísingina í samsvar við undirvísingarætlanina og tær av stjóranum givnu fyriskipanum.

Lærararnir hava eftir stjórans gjøllari ásetingum eftirlit við næmingunum. Tað liggur á lærarunum harumframt at hava eftirlit við skúlans innbúgvi og frálæringaramboðum v.m. Lærararnir eiga at vera tiknir við uppá ráð í sambandi við tilrættaleggjan av rakstri skúlans.

Lærararáð

Við hvønn skúla skal vera eitt lærararáð, sum er samansett av stjóranum, umsitingarleiðaranum og lærarum á skúlanum. Lærarar, sum í tí skúlaári starvast við skúlan, sum svarar til minst hálvt starv, eru á sama hátt limir í ráðnum.

Næmingaviðurskifti

Næmingarnir skulu halda skipanarreglur skúlans.

Grov ímisbrot móti skipanarreglum skúlans verða boðað stjóranum, sum avger, hvørt avvarðandi næmingur skal vísast burtur, og um næmingurin eftir umstøðunum fyri eitt víst tíðarskeið ikki skal hava atgongd til sjóvinnuskúlarnar.

Undir heilt serstøkum umstøðum kann stjórin eftir tilmæli frá lærararáðnum vísa einum næmingi burtur við ávirkan alt fyri eitt, men skal tá beinanvegin geva Landsskúlafyrisitingini frágreiðing um burturvísingina.

Við endan av hvørjum skeiði skulu tey arbeiði, sum næmingarnir hava gjørt, leggjast fram, eins og høvi verður givið næmingunum at vísa kynstur og kunnleikar.

Viðmerkingar til »uppskot um sjóvinnuskúla«

ad. 1 Setanar- og umsitingarviðurskiftir eru sambært teim vanliga reglunum fyri almennar skúlar. Umsitingarleiðari merkir í hesum føri varaskúlastjóri.

ad. 2 Skúlastjórin er sambært lóg um skúlafyrisiting undir Landsskúlafyrisitingini, og er honum álagt at fremja ásettu undirvísingarætlan og mál skúlans á rættan hátt. Undirvísingarskylda stjórans eigur at vera avmarkað, eftirsum tað er honum álagt at hava ábyrgd av roknskapi og protokollum umframt aðrar tænastuskyldur hansara sum stjóri.

Umsitingarleiðarin er sum nevnt varaskúlastjóri og skipar fyri innaru viðurskiftum skúlans undir stjóranum.

Skyldan hjá lærarum framgongur av greinini. Annars eigur at vera samanborið við reglugerðina fyri sjóvinnuskúla. Tað, at lærararnir verða tiknir við í ráðum í sambandi við rakstur skúlans, er ein skylda, sum stjórin eigur at taka til eftirtektar.

Viðvíkjandi lærararáði verður vist til aðrar skúlar sum t.d. sjómansskúlarnir.

ad. 3 Vist verður til reglugerð fyri sjóvinnuskúlar.

Uppskot um grund- og yrkisútbúgving innan sjóvinnu

1. Endamál

Endamálið við grundskeiðnum er at geva ungum, sum hava í hyggju at søkja arbeiði innan fyri sjóvinnuøkið eina grundleggjandi ástøðiligu og handliga útbúgving, umframt frálæru í almennum lærugreinum sum framhald av frálæruni í fólkaskúlanum. Í teimum almennu greinunum verður innihaldið í frálæruni skipað við atliti til fyritreytir næmingsanna.

Endamálið við yrkisskeiðunum er, at teir næmingar, sum fara undir skipsføraraútbúgving, fáa eitt hægri støddfrøðiligt og alisfrøðiligt støði, sum saman við læruni um trygd á sjónum ger, at hesir verða betri førir fyri at fara undir skipsføraraútbúgving. Fyri motorpassarar og skipsassistentar er endamálið, at hesir næmingar fáa betri kunnleika til nýtslu av amboðum sum eitt framhald av grundskeiðnum, og sum saman við læruni um trygd á sjónum gor hesar førar fyri at fara víðari annaðhvørt á skeið fyri motorpassarar ella í vinnu sum skipsassistentur.

2. Skipan á sjóvinnuskúla

Á sjóvinnuskúla verða grund- og yrkisútbúgvingarskeið hildin, sum vara ávikavist 25 og 10 vikur.

Undirvísingin á grund- og yrkisútbúgvingarskeiðunum er ókeypis. Fyri uppihald verður goldið hóskandi gjald, ásett av landsstýrinum.

Skeiðini verða gjøgnumførd sum kostskúlaskeið. Undir serstøkum umstøðum kunnu næmingar, sum ikki búgva á skúlanum, verða upptiknir.

3. Upptøka

